Burtursæð frá teimum tveimum seinastu árunum hevur gingið skjótt niður á bakka viðvíkjandi okkara møguleikum fyri fiskiskapi í fremmandum sjógvi. Og har sum niðurgongdin hevur verið størst, var í grønlendskum sjógvi. Rækjukvota okkara í Grønlandi fyri 1982 er bert 1/10 av rækjuveiðu okkara har í 1977. Toskafiskiskapur okkara, harímillum eisini fiskiskapur við standandi reiðskapi sum gørnum, var brádliga kvettur av í juli 1977, og hava vit ikki fingið loyvi at taka lut í hesi veiðu síðan. Lyftið í EF-sáttmálanum at taka spurningin upp, um so var at aðrir enn grønlendingar fingu loyvi til at fiska tosk, hava ikki higartil ført til nakrar kvotur. Lodnuveiðan við Eysturgrønland, sum í fjør var gjøgnumførd í samvinnu við grønlendingar, verður í ár av ongum orsakað av ágangi frá aðrari síðu. Royndir okkara at koma til sættis við grønlendingar um nýtslu av Nordafar og Føroyingahavnini til felags gagn, hava ikki higartil eydnast. Møguleikarnir fyri royndarveiðu eftir brosmu í Eysturgrønlandi og fyri at fiska rækjur í Vesturgrønlandi fyri grønlendingar, eins og vit áður hava fiskað fyri canadiarar, og sum vit vita, at danskir rækjumenn sleppa at gera fyri grønlendingar, verða nú kannaðir. Vónandi fer tað at eydnast føroyingum og grønlendingum at finna eitt samarbeiðslag til gagn fyri báðar partar í árunum, sum koma. Tað, at grønlendingar

hava valt at siga seg burturúr EF, skuldi ikki gjørt slíkar møguleikar verri.

Sitandi landsstýri hevur lagt stóran dent á, og hevur nýtt munandi upphæddir, at finna alternativ til tær mistu fjarleiðirnar. Flestu royndirnar miseydnaðust, fyrst og fremst av skeivari tilrættalegging. Tað einasta tiltakið, sum nú er í gongd, er royndarfiskiskapurin hjá Sjúrði Tollakksson við Vesturafriku. Royndirnar higartil hava prógvað, at tað er nógvur fiskur at fáa, men tað eru átrokandi spurningar at loysa, serliga uppi á landi, um henda vinna skal gerast fíggjarligt støði undir fleiri skipum framyvir. Eydnast tiltakið, er møguleiki hjá føroyingum at taka lut bæði á sjógvi og á landi.

Spurningurin um sjálvstøðuga føroyska umboðan í norðurlandaráðnum hevur verið viðgjørdur seinasta árið í tí so nevndu PETRI-kommiteeini. Alt bendir á at tað ikki eydnast at fáa sjálvstøðuga føroyska umboðan í Norðurlandaráðnum á hesum sinni. Hinvegin eru tekin til at vit kunnu fáa ávísar ábøtur í núverandi skipan, serliga viðvíkjandi arbeiðsmøguleikum innan ministararáðið og í samvinnu við embætismannakommiteirnar.

Samráðingar hava verið við danska ríkismálaráðið um yvirtøku av undirgrund og havbotni til føroyskt sermál. Enn er einki úrslit komið burturúr. Ætlanin er at hava nýggjar samráðingar í heyst.

Tað hevur eydnast at útvega føroyskum útisetum í Keypmannahavn hóskandi høli.

## Innanoyggja viðurskifti.

**Fíggjarviðurskifti**

Vøksturin í fiskaútflutninginum í 1981 helt áfram í 1982. Tann ætlaði útflutningurin fyrra hálvár í ár hevur eitt meirvirði uppá sløk 30% samanborið við somu seks mánaðar í fjør. Nøgdin hevur verið umleið 15% minni enn í fjør.

Serliga er tað útflutningurin av teimum traditionellu botnfiskasløgunum, sum er vaksin, t.v.s. av upsa, toski og hýsu. Eisini er útflutningurin av saltfiski hetta seinasta hálvárið vaksin munandi í mun til sama hálvárið í fjør, umleið 48% í nøgd og umleið 67% í virði.

Útflutningurin av rækjum er minkaður við stívliga 30%, 67% í nøgd og umleið 20% í virði, og kemur hetta sjálvandi av tørvandi kvotum í bæði Eystur- og Vesturgrønlandi.

Útflutningurin av mjøli og lýsi hevur higartil givið tað sama sum í

fjør, og útlitið fyri restini av árinum er ikki gott, nú vit ikki kunnu rokna við at fáa nakra lodnu við Jan Mayn og Eysturgrønland.

Tað gongur betri og betri at selja svartkjaftaúrdráttir til matna.

Sum áður nomið við, vísa allarseinastu innflutningstølini, sum tøk eru, at innflutningurin fyrstu mánaðirnar í ár stórt sæð er tann sami í krónum, sum fyri tilsvarandi mánaðir í fjør. Talan er sostatt um minkandi innflutning í nøgd.

Í 1981 var talan um nøkunlunda sama hall á gjaldsjavnanum sum í 1980, góðar 160 mio. kr. meðan hallið á handilsjavnanum var størri í 1981 enn í 1980. Tiltøkini hesum viðvíkjandi, sum framd vórðu í 1981, hava ikki havt størri ávirkan sama árið.

Viðmerkjast skal, at vøksturin í nettouttanlandsskuldini var einar 100 mio. kr. størri enn nevnda gjaldsjavnahallið uppá góðar 160 mio. kr. Orsøkin er kurstap uppá tey uttanlandslán, sum upptikin eru árini frammanundan í fremmandum gjaldsoyra.

Rentur, avdráttir og harafturat kurstap fara nú av álvara at merkjast fíggjarliga.

**Skattamál**

Ávísar broytingar eru framdar í núgaldandi skattalóg. Hesar hava ført til skattalætta fyri láginntøkur og fyri tey smærru partafeløgini. Til tess at fremja uppsparing og íløgur í feløg er avgjaldið av vinningsbýti hækkað. Eisini eru reglurnar fyri íløgugrunn broyttar í tann mun, at avsetingartíðin er stytt og avsetingarmarkið hækkað. Hetta fer at fremja avsetingar til rakstrargøgn og geva feløgunum størri avskrivingarmøguleikar.

Arbeitt hevur verið miðvist framímóti eini samtíðarskattaskipan. Henda er nú sett at koma í gildi 1. januar 1984. Uppskot til lóg um samtíðarskatt verður lagt fyri tingið í hesi tingsetu.

Sáttmáli er við at verða gjørdur við peningastovnarnar og P/F Elektron um at reka skattainnkrevjingina og uppskot verður í næstum lagt fyri tingið um at seta partapening í P/F Elektron og soleiðis fáa ein lim í nevndina fyri hetta felag.

Eingin ivi skal vera um, at tað er í tøkum tíma, at vit fáa eina nýggja skattalóg.

Hon vit hava er frá 1962 og er heilt ótíðarhóskandi. Av hesum stends inntøkumissur fyri land og kommnur.

**Innflutningsgjøld**

Seinasta heyst framdi tingið broytingar í innflutningsgjøldunum, sum góvu 50 mió. kr. afturat í inntøku fyri árið í landskassan.

Tollhækkingarnar raktu flest allar brúksvørur, tó ikki neyðsynjavørur - hesar eins og rávørur til íðnaðin fingu enntá lætta í tollinum.

Eisini aðrar broytingar eru gjørdar í tolllógini, sum miða ímóti at stuðla undir at seta virkir á stovn og at lætta um hjá virkjunum at fara undir nýggjar framleiðsluhættir.

Arbeitt verður við nýggjari tolllóg. Uppskot til hesa, sum byggir á hina sonevndu CCCN vøruskránna, verður vantuliga lagt fyri tingið í hesi tingsetu.

Landsstýrið hevur arbeitt við spurninginum um at seta transitt- og frígoymslu á stovn í Føroyum. Uppskot til lóg um hetta er greitt at leggja fyri tingið.

**Fiskivinna**

Frammanfyri havi eg umrøtt fiskivinnusáttmálar og føroyska fiskivinnu í fremmanduni sjógvi.

Trupulleikarnir á fjarleiðunum hava m.a. ført við sær, at munandi veiðuorka er flutt heim á egnar grunnar.

Tað eru útlit til, at henda gongdin heldur fram og vandi er fyri, at munandi orka afturat verður flutt heim í egnan sjógv. Her verður fyrst og fremst hugsað um rækjuskipini og fjar fiskitrolararnar.

Ein av okkara høvuðstrupulleikum er, at høvuðsvinnan- fiskivinnan - vísir eitt so stórt undirskot, at neyðugt er við 200 miljónum krónum í endurgjaldi úr landskassanum fyri at hava hana gangandi. Meginparturin av hesum endurgjaldi fer til heimaflotan, sum í støðugt størri mun skuldi verið álitið so hvørt sum rásarúmið á fjarleiðum minkar.

Høvuðsorsøkin til tann vánaliga rentabilitetin í fiskivinnuni er, at fiskastovnarnir við Føroyar eru ov nógv troyttir.

Kønir menn meta, at um okkara fiskastovnar vóru røktir á rættan hátt, so fiskaðu vit umleið eina helvt meira við Føroyar enn vit gera. Hetta hevði ført við sær, at munandi betri javnvág hevði verið í rakstrinum hjá okkara fiskiflota, og at tørvurin á studningi hevði verið tilsvarandi minni.

Út frá teimum kanningum, sum fiskivinnuráðið hevur gjørt, hava vit meira enn nóg mikið av veiðuorku til at veiða ta mest loyvdu nøgdina av botnfiskasløgunum við Føroyar, og veiðuorkan er eisini mett at vera nóg stór til at veiða ta nøgd, sum fiskastovnarnir væntast at geva, tá teir eru komnir á føtur.

Landsstýrið hevði varhugan av hesum, og tí varð steðgað fyri innflutningi av fiskiskipum til føroyar.

Hetta tiltak er ein av orsøkunum til, at fiskiflotin undir einum hóast alt vísir eitt betri úrslit í ár enn frammanundan.

Endurgjaldið til fiskiflotan er í veruleikanum lægri enn seinasta ár. Upphæddin fevnir í ár um munandi upphæddir til stuðlan av alternativum veiðutiltøkum.

Hóast fiskiflotin er ríkiliga stórur, so ber ikki til heilt at lata vera við útbyggingum. Út frá hesum hevur landsstýrið givið loyvi til nýbygging av fiskiskipum, og fleiri loyvir verða givin. Eitt einstakt loyvi er givið til innflutning av brúktum trolara.

Fiskivinnuráðið er í ferð við at gera nærri kanningar av, hvussu fiskurin bíligast fæst upp úr sjónum. Rakstrartølini vísa, at tað er stórur munum millum teir ymisku skipabólkarnar rakstrarliga sæð. Vit hava eina hóming av hvønn týdning partrolingin kann koma at hava. Nýskapanir og rationaliseringar verða eisini royndar í húkaveiðuni.

Umframt nevndu royndir at minka um veiðutrýstið á tey vanligu fiskasløgini, ella royndirnar at forða fyri, at trýstið veksur, hevur løgtingið samtykt, at fiskirannsóknarstovan fær myndugleika til at friða ávísar leiðir, um tað vísir seg, at ov mikið av ungfiski er uppi í veiðuni. Nærri reglugerð verður gjørd hesum viðvíkjandi.

Ætlanin er eisini til næsta ár at fremja ta avinarking av toska- og hýsuveiðini hjá størru trolarunum, sum nevnd var í løgmansrøðuni í fjør.

Í ár eru játtaðar 5,5 mió. kr. til praktiskar fiskiroyndir ímóti 2,5 seinasta ár. Hetta er fyrst og fremst fyri at gera meira víttfevnandi royndir til veiðu av høgguslokki við snellu, makreli við gørnum og svartkjafti við partroling.

Farið er undir at gera royndir við snarkøling av feskum fiski. Royndirnar verða fyribils mest gjørdar um borð á Magnusi Heinasyni.

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið notat um útbygging av okkara svartkjaftaveiðu og viðgerð á sjógvi og landi. Talan kann blíva, og verður vónandi, um stórar íløgur á hesum øki. Royndirnar seinastu árini hava víst, at vit bert hava fingið svartkjaft til ídnað eina stutta tíð av árinum. Stórur dentur verður lagdur á royndirnar at fiska svartkjaft og framleiða hann til matna umborð og á virkjum í landi. Í hesum sambandi verða fiskivinnuroyndirnar øktar við partroling og stórum skipum.

Viðmerkjast skal at landsstýrið hevur givið innflutningsloyvi til stóran 6 ára gamlan italskan trolara at nýta til svartkjaftaveiðu og viðgerð.

Laksaveiðan hevur eydnast væl í ár, og væl hevur gingið at selt alla veiðuna til góðan prís.

Eftir uppskoti frá landsstýrinum hevur løgtingið broytt lóggávuna

soleiðis, at landsstýrið nú saman við fiskivinnunevndini skal áseta reglur um fiskiveiðu á landleiðini. Við hesum hevur løgtingið fingið aftur nakað av tí ávirkan og valdi, sum tað misti fyri nøkrum árum síðan

**Ídnaður**

Fiskiídnaðurin má síggjast í samband við fiskivinnuna sjálva. Endurgjaldið frá tí almenna fer til virkir og skip undir einum.

Eins og fyri skipaflotan, so er orkan innan flakavirkir nóg stór í mun til ta rávøru, sum kann fáast. Í áðurnevnda notati frá landsstýri til løgting vóru nevndir møguleikar fyri stórum íløgum í verandi flakavirkir og nýggj virkir til framleiðslu av svartkjafti. Kanningar verða gjørdar um avleiðingarnar av, at ávíst ella ávís verandi flakavirkir á Skálafjørðinum og/ella í Vestmanna verða umløgd at tilvirka svartkjaft. Fleiri flakavirkir hava víst áhuga fyri hesum, og Bakkafrost verður útbygt til størri orku.

Áhugi er fyri at byggja virkir til víðari viðgerð, ella forgóðsking av fiskaúrdráttum, t.d. uppsagingarvirkir. Landsstýrið ætlar at stuðla mest møguligt á hesum týdningarmikla øki.

Tað er tvingandi neyðugt at meira liggur eftir heima á landi burtur úr tí rávøru, sum tøk er.

Royndir verða gjørdar við at turka svartkjaft og svartkjaftafars. Nevnast kann eisini, at Menningargrunnurin hevur skipað fyri stórum kanningararbeiði viðvíkjandi alginatvirkinum á Strondum. Royndirnar eru ikki loknar enn.

Ídnaðarvirkir í vanligum týdningi eru og verða stovnsett. Sum áður nevnt eru fleiri umsóknir um útbyggingar og nýíløgur enn nakrantíð fyrr.

Landsstýrið er framvegis sinna at stuðla skipabygging. Í fjør varð samtykt lóg um stuðul til bygging av farmaskipum. Seinri er lógin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum broytt soleiðis, at nýbygningar í Føroyum fáa 30% stuðulslán í staðin fyri 20%, umbyggingar í Føroyum fáa 20% í staðin fyri 15%. Nýbygningar bygdir uttanlands fáa vegis 15% í stuðulsláni, tó fáa skip yvir 120 føtur 20%.

Sum eisini nevnt fyrr eru fíggingarstovnarnir útbygdir m.a. við játtan í fíggjarlógini og við lántøku úr Nordiska Investeringsbankanum.

Spurningurin um lætta av tolli og avgjøldum á rávørum til ídnað, handverk v.m. er enn ikki loystur. Tó hava fleiri ídnaðarvirkir fingið lætta, og herumframt hevur landsstýrið fingið heimild til eisini at geva tolllætta á innfluttari emballagu. Arbeiðið við nýggjari tollløg, fer at gera tað lættari at loysa henda spurning.

**Fiskaaling og smoltframleiðsla**
Alingin av laksi og sílum gongur alt betri. Tað kennist at vit fáa betri og betri hald á hesi vinnu. Ágangurin uttaniífrá viðvíkjandi fiskiskapi av laksi í okkara egna sjógvi ger tað neyðugt, at vit í stórst møguligan mun taka lut í útsetan av laksasmolti.

Tvey smoltframleiðsluvirkir eru stovnsett seinasta ár. P/F Fiskaaling hevur framt og fremur munandi útbygging. Landsverkfrøðingurin er biðin um at kanna møguleikarnar, fyri at almennar fløgur í Vágum og íløgur í smoltframleiðslu verða samskipaðar. Ætlanin var og er at almennar fløgur í Haraldsundi skulu bøta um møguleikarnar fyri fiskaaling í økinum.

**Pelsdjóraaling**
Ein av landsstýrinum settur arbeiðsbólkur kannar møguleikarnar á hesum øki. Felag er skipað og til reiðar at fara í holt við eitt pelsdjóravirki fyrsta dagin.

**Landbúnaður**
Partar av Jarðarlóggávuni verður kannaðir í løtuni, og nevnd er niðursett at kanna fíggjarviðurskiftini hjá landbúnaðinum.

Landsstýrið hevur fyri sín part samtykt, at nýggj royndarstøð verður bygd í Kollafirði.

**Strandferðslan**
Ætlanirnar um at minka um umsitingina á strandferðsluni, serliga á ferðamannastovuøkinum eru ikki framdar. Tjak hevur sum nevnt verið um keyp av nýggjari ferju, men tað bleiv av ongum.

Hallið av Strandferðsluni hevur, hóast hækkandi gjøld, ligið uppá umleið 30 mió. kr. tvey tey seinastu árini, og verður mett til nakað tað sama fyri í ár.

Í sambandi við útbygging av Skopunar havn og byggjan av ferjulegu í Kirkjubø, er ætlanin at fáa nýggja og større ferju til Vestmannasund og nýta Sam um Skopunarfjørð.

Arbeitt hevur verið, og arbeitt verður framvegis, við møguleikunum fyri at leggja millumlandasiglingina inn í privat partafelag.

**Bussruturnar**
Broyting og rationalisering er framd á verandi bussrutum. Harumframt hevur royndarkoyring verið í Suðuroynni. Ætlanir eru um at fáa eina skipan við busskoyring setta í verk í hesum ári í Suðuroynni, Sundalagnum og Norðoyggjum í samband við bygdaleiðir.

**Helikoptaraflutningur**
Í fjør summar varð royndarflúgving framd av Mærsk Air og umsitin av Strandferðsluni. Politisk semja fekst ikki um at halda áfram við hesi flúgving. Í samband við politisku kreppuna í vár varð m.a. avtala gjørd um helikoptaraflúgving út á sniáplássini. Enn er flúgvingin ikki byrjað, men arbeitt verður við spurninginum framvegis.

**Uttanlandsflúgvingin**
Nýggj flogruta er komin í lag millum Bretland og Føroyar. Okkurt bendir á, at broyting fer fram viðvíkjandi skipanini av flúgvingini millum Føroyar og Danmark. Landsstýrið fylgir við spurninginum og ætlar at kanna møguleikarnar fyri føroyskari luttøku í hesi flúgving.

**Vegir og havnir**
Arbeitt verður uppá vegir og havnir í øllum økjum í Føroyum. Hetta er nærri lýst í skjølunum. Ískoytisætlan til galdandi havnaætlan verður løgd fyri tingið aftaná Ólavssøku.
Uppskot um útbygging í Skopun og gerð av ferjulegu í Kirkjubø er lagt fyri tingið í seinastu tingsetu. Havnin í Skopun er dýpd innan og portur verður nú ísett.

Berghol millum gøtu og Lorvík verður at byrja í heyst.

Aftaná 1. aprfl næsta ár verða 10 miljónir til gerð av sekunderum bergholum.

Helioportar verða gjørdir runt landið - t.d. í Gásadali, á Trøllanesi, í Svínoy, í Fugloy, Skúvoy og aðrastaðir.

**Orkumál**
Landstýrið hevur avgjørt gjøgnum Orkugrunnin at standa inni fyri, at rentur og avdrøg av eykaláni 6,5 milj. kr., ið IRF skal taka upp fyri at figgja eykakostnaðin av, at ruskbrennistøðin verður før fyri at lata hitaorku til upphitingar- og frystingarendamál í tíðini, inntil IRF hevur fingið avtakara til avlopshitan.

Landsstýrið hevur samtykt at veita 70.000,- kr. úr Orkugrunninum í studningi til eitt royndarprojekt, sum Orkuráðið ger í samarbeiði við Nordforsk.

Royndarprojektið er ætlað at geva kunnleika um, hvussu vindmyllur kunnu lagast til okkara verandi el-skipan, umframt at lýsa møguleikarnar við einum samansettum vindmyllu/dieselverki, har vindorkan beinleiðis skal kunna nøkta el-tørvin, tá vindur er, og dieselverkið bert verður nýtt, tá ovlítil vindur er.

Landsstýrið hevur samtykt úr orkugrunninum at veita 455.000 kr. til eitt samarbeiðsprojekt, sum Orkuráðið er farið undir saman við Nordforsk. Endamálið við projektinum et at kanna orkusparing við partroling í mun til hekkutroling.

Tær kanningarnar, sum landsstýrið hevur gjørt í samráð við Orkuráðið viðvíkjandi ætlaðu vatnmegiútbyggingini hjá SEV, er nú komnar so langt, at landsstýrið hevur góðkent, at SEV fer undir ein part av vatnmegiútbyggingini í Eysturoynni og tekur neyðug lán til hesa útbygging. Fyrivarni er tikið um hvørja støðu náttúrufriðingarnevndirnar taka til projektið.

**Kommunal mál**

Sum kunnugt eru fleiri av teimum føroysku kommununum ikki væl fyri fíggjarliga.

Ein orsøkin er, at studningurin frá ríkinum sambært 6-ára havnaætlanina enn ikki er útgoldin. Vónir eru um, at spurningurin heilt ella partvíst verður loystur í heyst.

Kommunali lánigrunnurin er fingin at virka.

Av teimum 9,8 mió. kr. til taks í grunninum eru býttar út 6 mió. kr. til 13 ymiskar kommunur.

Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri kommunufelagið og Tórshavnar Kommunu hava arbeitt við broytingum til kommunulógina. Arbeiðið er nú komið so langt, at uppskotið kann verða lagt fyri tingið.

Sami arbeiðsbólkur kann tínæst fara undir at gera uppskot til broytingar í kommunuvallógini.

**Telefonmál**

Telefongjaldsreglurnar eru broyttar soleiðis, at felags avgjald er fyri telefonsamrøður um alt landið.

Fasta gjaldið er ikki hækkað.

Nýggju reglurnar eru til fyrimuns fyri fbúgvar í útjaðaraøkjum og fyri tey minni mentu.

**Skúlamál**

Løgtingið samtykti í vár at seta á stovn sjálvstøðugan studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy.

Uppskot til frítíðarlóg er lagt fyri tingið. Málið varð ikki endaliga

avgreitt í seinastu tingsetu, men varð beint í skúlanevndina, ið varð gjørd til millumtinganevnd.

Landsstýrið hevur samtykt at góðkenna, at Føroya Maskinskúli verður bygdur á matr. nr. 1173 b í Marknagili og farast kann undir fyrircikingar til hesa bygging.

Við ársbyrjan varð farið undir at byggja deild Føroya Handilsskúla við Marknagilsvegin í Tórshavn.

Løgtingið hevur álagt landsstýrinum saman við stýri handilsskúlans at skipa fyri projektering av handilsskúla á Kambsdali. Farið er undir hesa projektering, og tá ið hon er liðug, verður uppskot um stuðul til hesa bygging lagt fyri tingið.

Landsskúlafyrisitingin saman við leiðslu og stýri fyri Tekniska skúlanum í Klaksvík er farin undir at gera byggiprogram til útbygging av Tekniska skúlanum.

Landsskúlafyrisitingin hevur sett eina nevnd at kanna og koma við uppskoti um, hvussu fiskivinnuútbugvingin á besta hátt kann skipast í Føroyum.

Løgtingið hevur samtykt eina broyting í lógini um sjómansskúla og sjómanslæru. Landsstýrið hevur í kunngerð ásett nýggj, strangari krøv serliga til heimaskiparalæruna.

Høvuðsuppgávan á skúlaøkinum hesi nærmastu árini er at bøta um viðurskiftini og møguleikarnar hjá teimum ungu, sum fara úr fólkaskúlanum og søkja sær viðari praktiska ella teoretiska útbúgving.

Ætlanir eru um hjá teimum flestu vinnuskúlunum at bøta um hølisviðurskiftini, lutvist við uppíbygging og lutvíst við nýbygging fyri teir skúlar, sum eingi egin høli hava sjálvir.

Fleiri nevndir og arbeiðsbólkar eru settir við tí uppgávu at endurskoða lærdómsinnihaldið í flestu vinnuskúlunum og koma við uppskoti til ábøtur og ajourføring, soleiðis at okkara skúlaskapur kann koma fult á hædd við skúlaskapin í okkara grannalondum, og samstundis hóskar so væl sum gjørligt til okkara egna samfelag.

**Heilsumál**

Ein kommunulækni er settur afturat í Norðurstreymi og ætlanin er at seta ein afturat í Eysturoynni.

Heilsumiðstøðirnar í Vági og Miðvági eru tiknar í nýtslu. Heilsumiðstøð í Runavík verður projekterað.

Nýggj ljósmóðurskipan er framd.

Nýggj heilsu-, heima- og skúlasjúkrasystraskipan er samtykt.

**Almannamál**

Landsstýrið leggur stóran dent á at halda við líka og bøta um sosialu reglurnar. Hetta hevur eisini eydnast.

Hækkanin av veitingunum eftir sosialu pensiónslógunum kom í gildi frá 1. apríl. Uppskot um broyting av forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni.

Tingið hevur samtykt lóg um bjálvingarstuðulslán til pensionistar. 120 pensionistar kunnu í hesum fíggjarárinum fáa upp til 25 tús. kr. í studningi til ymisk bjálvingartiltøk á sethúsum.

Tingið hevur samtykt broyting í lógini um Íbúðargrunn. Broytingin førir m.a. við sær, at møguleikarnir hjá kommununum og felagsskapum eru vorðnir betri at keypa ella byggja bústaðir til fólk við serligum sosialum tørvi.

Norðoya Ellis- og Vistarheim hevur fingið góðkenning frá lands- og ríkismyndugleikunum. Heimið, sum rúmar 9 avlamis- og fólkapensionistum, verður latið upp til heystar.

Endurbúgvingarstovnurin fer undir sítt virki at samskipa og útbyggja endurbúgvingina fyri avlamin og onnur brekað. Lýst verður eftir leiðara, sum í samarbeiði við Almannastovuna og Vanlukkutryggingarráðið skal byggja út virksemi so við og við.

**Mentamál**

Samtykt er lóg um alment sjónvarp. Lýst verður eftir fyristøðufólki.

Væntandi kann almenna sjónvarpið fara undir regluligar sendingar við árslok.

Landsstýrið hevur samtykt at fara undir kanningar at fáa greiði á, um gamla loranstøðin á Skúvanesi er nýtilig sum millumbylgjusendistøð hjá Útvarpi Føroya.

Seinasta vetur hevur verið arbeitt við einum musikkpedagogiskum royndartiltaki við professionellum lærarakreftum. Tiltakið eydnaðist so mikið væl, at hildið verður fram til heystar. Skipanin verður løgd undir landsskúlafyrisitingina.

Listaskálin, ið nú er 10 ára gamal, er í sera ringum standi, og verður farið undir eina høvuðsumvæling. Arbeiðið verður liðugt til heystar.

Arbeiðsbólkur er settur at koma við tilráðing um, hvussu gamla royndarstøðin í Hoyvík kann verða nýtt, tá ið nýggj royndarstøð verður tøk at taka í nýtslu.

**Fyrisitingarmál**

Sum nevnt í fjør, er ætlanin at byggja oman á Vaktar- og sjóbúðar-

grundina í Tinganesi. Hetta gevur í fyrstu atløgu betri pláss til umsitingina úti í Tinganesi.

Fyribils kanningar vísa, at tað ivaleyst verður møguligt at fáa bygt 4 ferðir 250 m², ovasta hæddin við skráveggjuni.

Nevnd er sett at fyrireika bygging av fyrisitingarhúsum eina ferð í framtíðini.

Nýggjur bygningur á Vaktar- og sjóbúðina ger tað møguligt tá at fáa flutt Føroya Løgting út aftur, har tað hoyrir heima — í Tinganesi.

---

Frammanfyri havi eg gjørt nakrar viðmerkingar um politisku og búskaparligu gongd og støðu í Føroyum.

Hóast mína skeivu metan í fjør um politiska samstarvið innan samgonguna, so hava vit eina rað av úrslitum at vísa á, sum telja rætta vegin.

Viðmerkjast skal, at eg eisini í øðrum føri metti skeivt fyri ári síðani, nevniliga tá eg helt andstøðuna fara at fáa fótin fyri seg og byrja at virka sum andstøða. Eisini her var eg ov bjartskygdur.

Í fjør endaði eg røðu mína við at ynskja gott samarbeiði millum landsstýri og løgting - bæði samgongu og andstøðu.

Somu ynskir verða borin fram í ár.

Seinasta hálvt annað árið vísti okkum, at okkara fólk er til reiðar at bera tey tiltøk og tær byrðar, sum við skili verða lagdar omaná byrðarnar frammanundan.

At tílík tiltøk enntá vekja virðing fyri og álit á løgting og landsstýri.

Sjálvt tey munandi tiltøk, sum eru framd, hava tíverri broytt kósina fáar gradir.

Spurningurin er nú, um samgongan og landsstýrið hava politiskt dirvi at broyta kósina nakrar gradir afturat og síðan við tolni og í konstruktivum samstarvi - eisini við andstøðuna - sigla okkum burtur úr okkara trupulleikum við ti úrsliti, at hugtakið sjálvbjargni ikki bert er eitt kensluborið rakstrarróp, men at tað aftur verður nakað neyðugt og náttúrligt fyri okkum sum fólk og sum tjóð.

*Sí skjal 2*

# 1. Undirgrund og havbotnur

Ár 1982, fríggjadagin 30. juli legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Hin 17. apríl 1975 gjørdi løgtingið soljóðandi samtykt:

»Føroya løgting samtykkir, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnur verður yvirtikið sum føroyskt sermál.

Løgtingið tekur til eftirtektar, at landsstýrið hevur havt samráðingar við donsku ríkisstjórnina um hesa yvirtøku og áleggur landsstýrinum at halda fram við hesum samráðingum hagar, til málið er avgreitt.«

Av tí at hetta mál, hóast stívliga 7 ár eru liðin síðan fyrrnevnda løgtingssamtykt varð gjørd, ikki enn er avgreitt, má tað haldast vera rætt, at løgtingið fær atstøður til at umrøða málið, harímillum at fáa frá landsstýrinum upplýsingar um, hvat ið hent er í tí í hesum farnu árum, og um støðuna í málinum í dag.

1. viðgerð 7. september. Skotið varð upp at beina málið í stýrisskipannarnevndina. Hetta fall við 1 - 0 atkvøðu. Málið varð síðan beint í marknaðarnevndina, sum 18. mars 1983 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 30. juli 1982 og undir 1. viðgerð tann 7. september 1982 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 8. mars 1983 viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Olaf Olsen og Jógvan I. Olsen) vísir til, at samráðingar eru farnar fram millum Føroyar og Danmark um at gera Føroya undirgrund og havbotn til føroyskt sermál. Hesar samráðingar eru ikki endaðar. Uppskot til kommissorium, ið er viðlagt, er latið donsku stjórnini, men svar er enn ikki komið.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Petur Reinert) skilar til:

Tað var Tjóðveldisflokkurin, sum 30. juli 1982 legði hetta mál fram á ting. Flokkurin minti á løgtingssamtyktina frá 17. apríl 1975, sum segði, at »Føroya løgting samtykkir, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnur verður yvirtikið sum føroyskt sermál, og at tað áleggur landsstýrinum at halda fram við samráðingunum hagar til málið er avgreitt«. Í framløguskrivi sínum helt flokkurin fyri, at hóast tað tá vóru liðin stívliga 7 ár, síðan henda samtykt hevði verið gjørd, so var málið enn ikki avgreitt, og at tað tí mátti haldast vera rætt, at løgtingið fekk atstøður til at umrøða málið, harímillum frá landsstýrinum at fáa upplýsingar um, hvat ið hent var í málinum í teimum farnu árunum og upplýsingar um, hvussu støðan tá var.

Málið kom til fyrstu viðgerð á tingfundi 7. september 1982 og varð sama dag beint í marknaðarnevndina.

Tá tað frættist, at samráðingar skuldu vera um málið við donsku ríkisstjórnina 12. oktober 1982, heitti Tjóðveldisflokkurin á marknaðnevndarformannin um sum snarast at fáa málið til viðgerðar í nevndini. Samstundis skilaði Tjóðveldisflokkurin til, at hann helt, at Tjóðveldisflokkurin, sum ein av teimum flokkum, ið samtykti yvirtøkuuppskotið frá 17. apríl 1975, átti at vera umboðaður í hesum tilætlaðu samráðingum.

Men hvørgum av hesum tilmælum Tjóðveldisfloksins vildi marknaðarnevndarformaðurin eftirlíka. Her fekst eingin marknaðarnevndarfundur og ei heldur fekk Tjóðveldisflokkurin nakað umboð í teirri føroysku samráðingarnevndini.

Av tí, at upplýst hevur verið, at løgtingsformaðurin átti at vera samráðingarleiðari, var tilmæli um luttøku Tjóðveldisfloksins eisini sent honum.

Men svarið, ið Tjóðveldisflokkurin fekk frá løgtingsformanninum var eisini sýtandi. Har fekst eingin umboðan frá Tjóðveldisflokkinum.

Hetta átalar minnilutin.

Í føroysku samráðingarnevndini sita løgtingsmenninir Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass.

Tó at tað í løgtingssamtyktini týðiliga verur álagt landsstýrinum at hava hesar samráðingar, so hevur — soleiðis sum mannagongdin hevur verið — landsstýrið í veruleikanum givið málið frá sær. Pauli Ellefsen hevur upplýst, at hann tekur ikki lut í hesum samráðingunum sum løgmaður, men sum tingmaður fyri sambandsflokkin, og sum slíkur hevur hann upplýst, at hann ynskir ikki yvirtøku, og at hann ikki fer at biðja donsku ríkisstjórnina um nakra yvirtøku. Pauli Ellefsen gongur sostatt móti løgtingssamtyktini um yvirtøku og heldur seg til ta støðu,

ið sambandsflokkurin tók við minnilutauppskoti sínum 17. apríl 1975 um ikki-yvirtøku, ið løgtingið feldi. Hetta sama er fleiri ferðir komið fram, m.a. á tingfundi 11. december 1981, har Pauli Ellefsen kallaði yvirtøkusamtykt løgtingsins »ábyrgdarleysa, ið niðurbrýtur virðingina fyri Føroya løgtingi«.

Løgtingssamtyktin frá 17. apríl 1975 er ikki til at misskilja. Hon talar um yvirtøkur og einki annað. Tað er tí ábyrgdarleyst og háð móti Føroya løgtingi at hava Paula Ellefsen við í hesum samráðingum og beinleiðis í stríði við gjørda løgtingssamtykt.
Hetta átalar minnilutin.

Nú ið tað so er framkomið, at landsstýrið hevur givið málið frá sær, má tað vera løgtingið sum slíkt, ið tekur málið í sínar hendur, og at tað verður løgtingið, ið velur samráðingarmenn sínar, og at tað ikki verða tríggir tilvildarligir løgtingsmenn - soleiðis sum higartil hevur verið - ið hava útnevnt seg sjálvar til hesa uppgávu. Hesir tríggir løgtingsmenn-,Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass — hava tikið sær ræði, ið teir onga sum helst heimild hava til at taka sær.

Samtíðis sum minnilutin harðliga átalar hesa lógloysis mannagongd, setir hann tí fram hetta

## I Uppskot til samtyktar

Nú tað er framkomið, at landsstýrið ber seg undan at ganga undir tær skyldur, sum løgtingið álegði tí í løgtingssamtyktini frá 17. apríl 1975 — at hava samráðingar við donsku ríkisstjórnina um yvirtøku av undirgrund og havbotni — samtykkir løgtingið at taka málið í sínar hendur og velur 6-manna millumtinganevnd — ein úr hvørjum tingflokki — til at føra hesar samráðingar.

Harafturat skilar sami minniluti (Erlendur Patursson og Petur Reinert) til:

Hin sjálvuppgjørda samráðingarnevnd hevur sent donsku ríkisstjórnini »forslag til kommissorium« viðvíkjandi samráðingum. Í hesum »kommissorium« verður m.a. soleiðis tikið til: »Udvalget undersøger og udarbejder forslag til en færøsk råstofforduing baseret på ligestillingsprincippet ....«.

Hetta orðalag er beinleiðis í stríð við yvirtøkusamtykt løgtingsins,

har bert yvirtøka verður nevnd og ikki nøkur »færøsk råstofordning baseret på ligestillingsprincippet.«

Við hesum uppskoti sínum um »kommissorium« er tí henda samráðingarnevnd gingin uttan um yvirtøkusamtykt løgtingsins.

Eisini hetta átalar minnilutin harðliga, og ger hetta tað upp aftur neyðugari, at samráðingarnevndin fær aðra samanseting enn ta núverandi, soleiðis sum mælt verður til í hesum áliti.

Í aðrar mátar er minnilutin við í uppskoti meirilutans um, at løgtingið heldur fast við løgtingssamtyktina frá 17. apríl 1975 um, at Føroya løgting samtykkir, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnur verður yvirtikið sum føroyskt sermál«.

Ein annar minniluti (Jørgen Thomsen) førir fram:

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur skrivað: »Samráðingar verða førdar við donsku stjórnina um at gera undirgrund Føroya og havbotn til føroyskt sermál.«

Samgongan hevur valt eina samráðingarnevnd av løgtingsmonnum úr samgonguni at føra samráðingar við donsku stjórnina.

Í marknaðarnevndini hevur verið boðað frá, at Jógvan Sundstein er samráðingarleiðari fyri hesi nevndini.

Eisini er boðað frá, at hesar samráðingar verða førdar uttan um landsstýrið.

Rættiliga tíðliga kom til sjóndar stóra ósemjan í sitandi samgongu. Tað er tí Javnaðarfloksins metan, at tað ikki er rætt á nakran hátt at senda eina nevnd av so ósamdum monnum niður til Danmarkar at samráðast um so týðandi spurningar, ið her er talan um.

Javnaðarflokkurin kann tí ikki taka undir við tí, sum henda samráðingarnevndin fæst við í hesum sambandi.

Tað er Javnaðarfloksins metan, at hesar samráðingar, meiri eru til skaða enn til gagns, fyri at finnast kann ein skilagóð loysn á undirgrundsspurninginum.

Øðrvísi hevði tað virkað mótvegis donsku stjórnini, um so var, at ein nevnd varð vald við einum umboði úr hvørjum flokki at føra hesar samráðingar. Soleiðis sum Javnaðarflokkurin fyrr hevur víst á.

Tí verður sett fram soljóðandi

II

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið velur eina nevnd av 6 limum, ein úr hvørjum flokki á

tingi, at føra samráðingar við donsku stjórnina um undirgrundsspurningin.

— — — — — — — —

Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Olaf Olsen, Jørgen Thomsen, Erlendur Patursson og Petur Reinert seta fram soljóðandi

III

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya løgting heldur fast við samtyktina frá 17. apríl 1975: Føroya Løgting samtykkir, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnur verða yvirtikin sum sermál.

**Forslag**
**til**
**kommissorium**

**I anledning af, at Færøernes Lagting den 17. april 1975 har vedtaget, at hjemmestyret overtager sagsområdet Færøernes undergrund og havbund (landsokkelen), har der været ført forhandlinger mellem regeringen og landsstyret.**

**Som et led i forhandlingerne er man blevet enige om, at spørgsmålet om en overtagelse bør undersøges nærmere. Man har derfor vedtaget at nedsætte et udvalg med følgende kommissorium:**

1) **Det undersøges og redegøres for, hvordan der indenfor den gældende statsretlige ordning mellem Danmark og Færøerne — hjemmestyreordningen — eller i henhold til gældende retsprincipper er juridisk muligt for hjemmestyret at overtage sagsområdet Færøernes undergrund og havbund, eller som det udtrykkes i hjemmestyreloven »Råstoffet i undergrunden.«**

2) **Udvalget undersøger og udarbejder forslag til en færøsk råstof-**

**ordning baseret på ligestillingsprincippet, men indenfor disse rammer med videst mulig hensyntagen til færøske interesser, hvad enten disse måtte være af styrelsesmæssig eller økonomisk karakter.**

**Udvalget, der bør færdiggøre sit arbeide hurtigst muligt, sammensættes således:**

**Tórshavn, den 12. januar 1983**

**Pauli Ellefsen** **Hilmar Kass** **Jógvan Sundstein**

2. viðgerð 24. mars, atkvøðugreiðsla 12. apríl. Uppskot III varð samtykt við 22 - 0. Atkvøtt varð við navnakalli.

*Ja atkvøddu:* Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Olaf Olsen, Jógvan Sundstein.

*Atkvøddu ikki:* Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen.

Uppskot I fall við 10 - 0 og II fall við 13 - 0.

---

# 2. Føroyskt umboð í Norðurlanda Ráðnum

Ár 1982, fríggjadagin 30. juli legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Hin 16. mars 1977 gjørdi løgtingið soljóðandi samtykt:

*Løgtingið tekur undir við, at spurningurin um sjálvstøðuga føroyska umboðan í Norðurlandaráðnum verður tikin upp aftur til viðgerðar í ráðnum, og heitir á landsstýrið um at taka neyðugar samráðingar hesum viðvíkjandi.«*

Í løgtingssetuni 1979 (smb. løgtingsmál nr. 72/1979) hevði løgtingið til viðgerðar uppskot um slíkar broytingar í Norðurlandaráðssáttmálunum, ið gav bæði Føroyum og Grønlandi sjálvstøðuga umboðan í ráðnum. Hin 21. apríl 1980 samtykti tingið at senda landsstýrinum málið til viðgerðar.

Nú ið stívliga 5 og 2 ár eru liðin, síðan hesar báðar samtyktir vóru gjørdar, og tað ikki enn eru tekin til nakra loysn, má tað haldast vera rætt, at løgtingið fær atstøður til at umrøða málið, harímillum at fáa frá landsstýrinum og føroysku limunum í Norðurlandaráðnum upplýsingar um, hvat ið er hent í tí í hesum farnu árum, og um støðuna í málinum í dag.

Sí skjal 3

1. viðgerð 7 september. Skotið varð upp at beina málið í stýrisskipanarnevndina, hetta fall við 7 - 0 atkvøðum. Málið varð síðani beint í marknaðarnevndina, sum 16. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Erlendi Patursson 30. juli 1982 og undir 1. viðgerð 7. september beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og setir fram soljóðandi

## Uppskot til samtyktar

Løgtingið heldur fast við løgtingssamtyktina frá 16. mars 1977: »Løgtingið tekur undir við, at spurningurin um sjálvstøðuga føroyska umboðan í Norðurlandaráðnum verður tikin upp aftur til viðgerðar í ráðnum, og heitir á landsstýrið um at taka neyðugar samráðingar, hesum viðvíkjandi.«

2. viðgerð 17. februar 1983. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 25 - 0 atkvøðum.

---

# 3. Setan av fólki í almenn størv

Ár 1982, fríggjadagin 30. juli legði Petur Reinert, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur til viðgerðar setanirnar av fólki í almenn størv.

*Viðmerkingar:*
Sum øllum tingmonnum kunnugt, er setanin av fólki í almenn størv vorðin samrøðuevni millum fólk, tí fólk eru farin at ivast í, hvat hitt almenna leggur mesta dentin á, tá fólk verða sett í almenn størv, aftan á at hesi størv hava verið lýst leys.

Vit í Tjóðveldisflokkinum meta tað vera av alstórum almennum týdningi at fáa upplýst - og tá ikki minst frá núverandi samgongu - hvussu setanin av almennum størvum verður framd.

1. viðgerð 7. september. Skotið varð upp at beina málið í 5-mannanevnd. Hetta fall við 10-10 atkvøðum. Málið varð síðani beint í landsstýrismálanevndina, sum 13. december legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 30. juli 1982 og undir 1. viðgerð 7. september beint í landsstýrismálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Edmund í Garði og Flemming Mikkelsen) heldur ikki

nakað óvanligt ella óregluligt vera farið fram í teimum almennu starvsetingunum, ið eru framdar undir núverandi samgongu, sum sipað verður til í viðmerkingunum.

Undir 1. viðgerð kom fram, at nevndin (ella onnur nevnd) átti at kanna almennar starvsetanir fleiri ár aftur í tíðina.

Nevndin heldur ikki, at hon eigur at fara undir slíka kanning.

Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen) heldur, at undir orðaskiftinum á tingi um almennar starvssetanir kom so mangt fram, at tað má vera rætt at gera eina kanning, hesum viðvíkjandi.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið velur við lutfalsvali eina 5-manna nevnd av ikki-tingmonnum at kanna almennar starvssetanir tey seinastu 15 árini.

Nevndin leggur frágreiðing fyri tingið í seinasta lagi 15. august 1983.

2. viðgerð 16. december. Uppskotið fall við 14 - o atkvøðum.

F.L. 301-9-11.

# 4. Løgtingslóg um koppseting av sleppingarlombum

Ár 1982, týsdagin 7. september legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um koppseting av sleppingariombum fyri garnasótt.**

**§ 1.** Eitthvørt sleppingarlamb skal koppsetast fyri garnasótt eftir leiðbeining og ávísing landsdjóralæknans.

**§ 2.** Fyri brot av hesi lóg verður eigarin av lambinum sektaður við bót.

**§ 3.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin og verður galdandi til og við 1989.

**lagtingslov om vaccinering af tillægsfår for paratuberkulose.**

**§ 1.** Ethvert tillægs får skal vaccineres for paratuberkulose efter vejledning og anvisning af landsdyrlægen.

**§ 2.** For overtrædelse af denne lov straffes ejeren af lammet med bøde.

**§ 3.** Denne lov træder i kraft straks og forebliver gyldig til og med 1989.

**Viðmerkingar:**

Seyðagarnasjúkan (paratuberculosis) spjaðist alt meir og meir kring landið og hevur á vissum plássum tikið seg upp við álvarsligari ferð og til stóran skaða fyri seyðahaldið.

Heilivágur til koppseting — vaccinering — hevur ikki verið tøkur fyrr

enn nú, og vísir tað gleðiliga seg, at áhugin millum manna fyri hesi koppseting er stórur.

Tað nyttar tó lítið, ja er til fánýtis, um nakrir ánarar ella hagapartar sjálvbodnir koppseta, meðan aðrir ánarar og hagapartar ikki vilja gera tað út frá tí sjónarmiði, at teirra seyður enn ikki hevur sjúkuna, tí sóttin, sum er eitt slag av tuberklum, smittar frá seyði til seyð við tøðunum. Hetta kemur ofta fyri, tá seyður gongur í stiki ella gongur saman á felagsbeiti, tá summarfriðingin av bønum er av.

Tí meti eg tað at vera neyðugt at lógarfesta koppsetingina av øllum-sleppingarlombum fyri garnasótt.

Um tingið samtykkir hetta lógaruppskoti um tvungna koppseting av sleppingarlombum, tekur tað umleið 7 ár, áðrenn hendan umfars-sjúkan - garnasótt - er bast í Føroyum, men um koppsetingin skal vera sjálvboðin, verður sjúkan ongantíð bast her á landi.

Til sammetingar kann nevnast, at tá slíkar umfarseyðasóttir komu til Íslands í 1933, varð úrslitið har, at ein heilt stórur partur av seyða-haldinum í Íslandi doyði av sjúkuni. Fyrst tá verndartiltøk vórðu lógarfest, vanst á sóttunum.

Eisini minnast tey flestu, at tuberkulosuni, sum herviliga týndi mangan føroying, fekst fyrst tamarhald á, tá føroyingar lótu seg koppseta fyri hesi sjúku, og er tuberklasjúkan her á landi millum manna ógvuliga sjálvsom.

Sostatt loyvi er mær at seta fram fylgjandi uppskot fram.

1. viðgerð 9. september. Málið varð beint í landbúnaðarnevndina, sum 27. apríl 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt tann 7. september 1982 av Ova Mikkelsen og við fyrstu viðgerð tann 9. september 1982 beint í landbúnaðarnevndina.

Beinanvegin málið var komið í landbúnaðarnevndina varð landsdjóralæknin spurdur, um so var, at hetta lógaruppskotið varð samtykt og kom í gildi so skjótt, sum til bar, um tað í praksis læt seg gera at koppseta øll sleppingarlombini á heysti 1982.

Svarið var, at hetta ikki læt seg gera, orsakað av at tað ikki var møguligt at fáa til vega koppingarevni við so stuttum skotbráði.

Landbúnaðarnevndin hevur síðan havt fund við djóralæknarnar D.J. Bærentsen og Justinus Olsen og seyðarágevaran Tummas Joensen. Nevndin heitti á landsdjóralæknastovnin um at koma við eini frágreið-

ing um, hvussu koppsetingin fyri garnasótt er skipað, og um hvussu gongdin hevur verið, síðan koppsetingin byrjaði, og gera viðmerkingar til málið sum heild.

Teir framføra:

»Garnasóttin var á fyrsta sinni staðfest í Føroyum í 1974. Síðan tá hevur hesin stovnur roynt at kortlagt sóttina samstundis, sum stig eru tikin til at fáa koppingarevni fyri hesa sótt. Á hesti 1982 varð byrjað at koppseta fyri garnasótt, og var koppingarevni tókt hjá teimum, sum sjálvbodnir vildu koppseta sín seyð.

Garnasótt er ein sera langrøkin sjúka, so uttan mun til um koppsetingin er sjálvboðin ella ásett við lóg, fara tað at ganga mong ár - helst 2 seyðaaldrar - áðrenn tamarhald er fingið á sóttini. Um sóttin kann útruddast við koppseting er enn ikki prógvað. Í Íslandi byrjaðu teir at koppseta fyri umleið 30 árum síðani. Tamarhald fekst skjótt á sóttini, og er hon í dag uttan búskaparligan týdning; men enn missa íslendingar umleið 1 % av áseyðinum av garnasótt. Í Íslandi er koppseting logboðin. Grundað á hesi viðurskifti og á, at teir, sum koppseta sín seyð, verða sum frálíður vardir fyri sóttini, er higani lagt upp til, at koppsetingin verður sjálvboðin. Skuldu áneyðir verið fyri at gjørt koppsetingina lógbodna, eru heimildir at gera tað eftir lov nr. 36 fra 28. febr. 1908 om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrene m.m.

**Gongdin higartil**

Á vári 1982 var í bløðum og útvarpi heitt á seyðaeigarar, sum sjálvbodnir vildu koppseta sín seyð, um at boða hesum stovni frá, so koppingarevni kundi vera umbiðið. Tá freistin fyri fráboðan var úti, vóru 10.000 skamtir umbidnar, og byrjað var at koppseta í oktober 1982.

Niðanfyri er gjørt upp, hvussu undirtøkan var í teimum einstøku pørtunum av landinum. Til samanberingar er seyðatalið 1. dec. 1980 tikið við. Koppingarevni skuldi umbiðast í góðari tíð, og tíverri vóru tað rættiliga nógvir seyðaeigarar, sum boðaðu ov seint frá og fingu onki koppingarevni. Fyri at vísa áhugan fyri tiltakinum í 1982 er samlaða áseyðatalið, sum var fráboðað til koppseting, eisini tikið við.

| | Seyðatal 1. dec. 1980 | Samlaða talið av áseyði, sum var fráboðað til koppseting í 1982 | Talið av áseyði, hvørs sleppingarlomb vóru koppsett í 1982 | Koppsett sleppingarlomb í 1982 |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroy og Lítla Dímun | 11.326 | 12.525 | 10.590 | 3.701 |
| Sandoy, Skúvoy og Stóra Dímun | 8.107 | 5.516 | 5.204 | 1.115 |
| Suðurstreymoy, Hestur, Koltur og Nólsoy | 6.104 | 4.381 | 4.381 | 1.056 |
| Norðurstreymoy | 9.403 | 4.494 | 3.414 | 822 |
| Vágoy og Mykines | 6.800 | 6.685 | 6.365 | 1.610 |
| Eysturoy | 14.875 | 5.822 | 4.572 | 1.007 |
| Norðoyggjar | 8.652 | 3.999 | 2.104 | 516 |
| Alt landið | 65.267 | 43.422 | 36.630 | 9.827 |

Av hesi uppgerð sæst, at umleið 2/3 av øllum áseyðinum var meldaður til koppseting longu fyrsta árið, meðan sleppingarlomb svarandi til stíva helvt av áseyðinum vóru koppsett.

Av uppgerðini sæst eisini, at áhugin fyri at koppseta er størstur, har ið sóttin hevur gjørt mest um seg, nevniliga í Suðuroy, Vágum og í Suðurstreymoy, meðan áhugin er minni, har ið sóttin ikki hevur gjørt vart við seg enn.

Eftir tilráðing úr Íslandi og Noregi var rættiliga nógv gjørt burturúr

at leggja seyðaeigarum lag á hetta arbeiði, og dentur var lagdur á, at neyðugt er at arbeiða serliga reinliga og at ansa eftir sær sjálvum.

Koppsetingin seinasta heyst gekk stak væl. Eingin fráboðan er komin higar um, at seyður er sjúklaður av koppsetingini, og eingi fólk hava fingið mein av at koppseta. Sostatt kunnu vit siga, at fyrsta og tyngsta takið er tikið, og verður tað óivað munin lættari at fara undir hetta arbeiðið til heystar.

**Gongdin framyvir**

Vit eru vitandi um, at fleiri hava aftrað seg við at koppseta júst tí, at tað eru so nógv fyrivarni at taka. Tær góðu royndirnar av koppsetingini seinasta heyst fara óivað at gera, at undirtøkan verður størri til heystar.

Tíverri er kanska gjørt ov lítið burturúr at gera seyðaeigarum greitt, at tess fyrr farið verður undir at koppseta, tess minni fer sóttin at gera um seg. Á teimum plássum, har ið sóttin er staðfest, fara tað at ganga mong ár, áðrenn tamarhald er fingið á sóttini, meðan teir, sum ikki hava sóttina, kunnu halda hana burtur við at koppseta. Ætlanin er at gera meira burtur úr hesum í framtíðini.

Eisini er ætlanin at mæla seyðaeigarum til at koppseta allan seyðin og ikki bert sleppingarlombini. Orsøkin til, at hetta ikki var gjørt seinasta ár, er, at tað er mest umráðandi at koppseta sleppingarlombini. Seinasta ár høvdu vit ongar royndir at byggja á. Tí var mett, at rættast var at fara hóliga fram. Skuldi tað víst seg, at seyður sjúklaðist av koppsetingini, høvdu kanska fleiri aftrað seg at koppseta aftur til heystar, og vandi kundi verið fyri, at tiltakið doyði burtur. Verður allur seyðurin koppsettur í einum hagaparti, er tað bert talan um at gera hetta tað eina árið fyri síðan at koppseta sleppingarlombini á hvørjum heysti.

Við hesi skipan meta vit, at tað bert fara at ganga fá ár, til meginparturin av seyðinum er koppsettur. Sum tíðin fer, eru møguleikar fyri at fylgja gjølla við, hvussu gongdin verður. Áður er nevnt, at heimildir eru til at gera koppsetingina lógbodna, um tað skuldi verið neyðugt.

**Lógboðin koppseting**

Verður koppsetingin ásett við lóg, er samstundis neyðugt at taka fylgjurnar av hesum.

Tað er ikki nóg mikið at fara til eigararnar av teimum einstøku hagapørtunum og traðunum og geva teimum boð um at koppseta.

Eingi fullfíggjað hagtøl eru fyri áseyðatalinum. Seyðateljingin, sum

Hagadeildin skipar fyri, er bert leiðbeinandi og í ávísum førum gjørd eftir meting, og er tí ikki nóg gott grundarlag fyri koppsetingini. Til dømis kann nevnast, at í Froðbiar sókn er áseyðatalið uppgivið til 2730 í 1980. Í 1982 var fráboðaða áseyðatalið til koppseting 3105.

Við uppskotinum um lógbodna koppseting verður miðað í móti at útrudda sóttina eftir 7 árum. Áður er greitt frá, at í Islandi hevur tað ikki eydnast eftir 30 árum.

Verður koppsetingin lógboðin, er neyðugt á hvørjum plássi at útpeika menn, sum skulu taka sær av koppsetingini. Neyðugt verður eisini, at hesir menn eru við í rakstrinum um heystið og møguliga eisini í áseyðaroyting fyri at taka seyð úr, sum ikki er koppsettur. Slík skipan verður rættiliga kostnaðarmikil, og valla verður málið rokkið kortini.

Samanumtikið kann sigast, at við sjálvbodnari koppseting verður meginparturin - helst meira enn 65.000 av 70.000 áseyðum - koppsettur. Kostnaðurin av hesum verður umleið 70.000 kr. um árið umframt ómakin at koppseta. Við lógbodnari koppseting verða kanska 69.000 av 70.000 áseyðum koppsettir. Kostnaðurin av hesum verður munandi størri, og hóast hetta eru útlitini fyri at útrudda sóttina vánalig, ið hvussu so er við tí vitan, vit hava um sóttina higartil.«

Ein meiriluti (Tórálvur Mohr Olsen, Óli Kristian Debes og Jógvan Olsen) er komin til ta niðurstøðu, at hann tekur ikki undir við uppskotinum um serliga lóggávu um tvungna koppseting móti garnasótt, men at hetta sum higartil verður gjørt eftir tilráðing og eftirliti frá landsdjóralæknastovninum og setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 2. mai. § 1 fall við 6 - 0.

# 5. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir

Ár 1982, hósdagin 9. september legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 15 mió. kr.

§ 2. Treytirnar fyri at veðhald kann verða veitt eru hesar:

I At líkindi eru til, at rakstur in framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

II a) Har talan er um fiskavirkir, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta

**lagtingslov om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1982/83 at garantere for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 15 mio. kr.

§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

I At der er udsigt til, at driften framover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

II a) Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder, at egenkapitalen forhøjes med

lagi 10% av tí peningi, ið veittur verður sambært hesi lóg. At fingin verða onnur veðhald fyri í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella fingin verða onnur lán, sum ikki krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambært hesi lóg.

II b) Har talan er um fiskiskip, har partafelag er ognari, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí veðhaldsupphædd, ið veitt verður sambært hesi lóg.

II c) Har talan er um fiskiskip har einstaklingur, partreiðarar ella líknandi eru ognarar, at inugoldin verður spardur skattur, sum stavar frá avskriving uppá skipið seinastu 5 árini, og *at* nýinngoldin verða 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.

mindst 10% af det beløb, der ydes i henhold til denne lov. At andre garantier tilvejebringes for minst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i henhold til denne lov.

II b) Hvor talen er om fiskerskibe, der tilhører aktieselskab, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garantibeløb, der ydes i henhold til denne lov.

II c) Hvor der er talen om fiskerskib, der ejes af enkeltperson, partsrederi eller lignende, at der indbetales sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet de sidste 5 år, og at ny indbetalt bliver 10% at det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Samstundis fer løgtingslóg nr. 7 frá 24. februar 1981 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir úr gildi.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 7 af 24. februar 1981 om garanti for lån til fiskerskibe.

*Viðmerkingar:*
Víst verður til tingmál nr. 137/1981: Veðhald fyri lánum til fiskskip

og fiskavirkir.

Hetta mál fall. Í staðin varð løgtingslóg nr. 69 frá 21. mai 1982 § 8, tingmál nr. 143/1981 um broyting í løgtingslóg »um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna« givin heimild at veðhalda upp til 10 mió. kr.

Henda heimild er uppbrúkt, og landsstýrið metir, at tørvur at veita kreppulán restina av hesum fíggjarárinum verður upp í móti 15 mió. kr.

1. viðgerð 13. september. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 17. í s.m. legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 9. september 1982 og undir 1. viðgerð 13. september beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Adolf V. Hansen) mælir til, at í § 2, II b) verður reglan um partafeløg tikin út og í § 2, verður II c) strikað. Samsvarándi hesum setir minnilutin fram niðanfyri standandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

### Broytingaruppskot

| | |
|---|---|
| Í § 2, II b) verður orðingin »har partafelag er ognari« tikin burtur. | I § 2, II b) bliver formuleringen »der tilhører aktieselskab« annuleret. |
| Í § 2, gongur II c) út. | I § 2, udgår II c). |

Minnilutin (Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) mælir til, at orðingin í § 2, c): »at inngoldin verður spardur skattur, sum stavar frá avskriving uppá skipið seinastu 5 árini« tikin burtur, og at í staðin verður sett: »at inngoldið er í minsta lagi so mikið sum spardur skattur«.

Samsvarandi hesum setir nevndi minniluti fram niðanfyri standandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

### Broytingaruppskot

| | |
|---|---|
| § 2, II c) verður orðað soleiðis: »Har talan er um fiskiskip har | § 2, II c) formuleres således: »Hvor der er tale om fiskerskibe, |

einstaklingur, partreiðarar ella líknandi eru ognarar, at inngoldið er í minsta lagi so mikið sum spardur skattur, og at nýinngoldin verða 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.«

der ejes af enkeltperson, partsrederi eller lignende, at der indbetales i mindste fald lige så meget som der er sparet i skat, og at nyindbetalt bliver 10% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften.«

Minnilutin (Atli P. Dam og Ove Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at løgtingið samtykkir áður framsett lógaruppskot um skilabótalán til fiskivinnuna. Samsvarandi hesum setir nevndi minniluti fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um skilabótalán til fiskivinnuna.**

§ 1. Landsstýrinum saman við fíggjarnevndini er heimilað landskassans vegna at taka upp innan- ella uttanlands lán uppá 55 milj. kr. sum skilabótatiltak fyri fiskivinnuna.

§ 2. Lánið verður at nýta til endurfígging av veðskuldalánum í skipum, sum vegna ólagaliga fígging uttanlands hava óvanliga tungan rakstur.

§ 3. Landsstýrið og fíggjarnevnin játta í hvørjum einstøkum føri skilabótalán aftaná tilmæli frá »serlánsnevndini«.
2. *stk.* Hvørt skilabótalánið sær

**lagtingslov om refinancieringslån til fiskerierhvervet.**

§ 1. Landsstyret sammen med finansudvalget bemyndiges til landskassens vegne at der optages inden- eller udenlandslån på 55 mill. kr. som refinancieringslån for fiskerierhvervet.

§2. Lånet skal bruges til refinanciering af pantsikrede lån i skibe, som på grund af uhensigtsmæssig financiering udenlands har usædvanlig tunge driftsbetingelser.

§ 3. Landsstyret og finansudvalget bevilger i hvert enkelt tilfælde refinancieringslån efter indstilling fra »serlánsnevndin«.
*Stk.* 2. Hvert enkelt refinancier-

verður at tryggja við sama veð sum tey avloystu uttanlandslánini høvdu. Tó kann loyvast føroyskum banka ella fíggjanarstovni veð innan sama karm, tá slíkir taka lut í endurfíggingini.

§ 4. Føroya gjaldstova umsitur skilabótalánini, og kann hon eins lítið og landsstýrið ella fíggjarnevnd játta útsetan við rentu- og avdráttargjaldi, tá lánini eru løgd í fasta legu.

§ 5. Landsstýrið leggur fyri fíggjarnevndina til góðkenningar uppskot um reglugerð fyri skilabótalán til endurfígging.

§ 6. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

ingslån skal sikres samme panteret som de udenlandslån havde før de blev afløst. Dog kan tillades færøsk bank eller pengeinstitut pant indenfor samme ramme, når disse tager del i refinancieringen.

§ 4. Føroya gjaldstova administrerer refinancieringslånene, og kann denne lige så lidt som landsstyret eller finansudvalget tillade udsættelse med rente- og afdragsbetaling, når lånene er lagt i fast ramme.

§ 5. Landsstyret forelægger finansudvalget til godkendelse forslag til reglement for refinancieringslån.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

*Viðmerkingar:*

Í 60'unum og nakað upp í 70'ini læt landskassin vanliga veðhald fyri 70% av byggikostnaðinum, tá føroysk skip vórðu bygd uttanlands við útlendskari fígging.

Í flestu førum rakk hetta veðhald til samlaða lánið uttanlands.

Tann nógva byggingin fór fram í Noregi, og var lánitíðin har vanliga 7 - 8 ár mótvegis 10 - 15 í Føroyum og Danmark. Miðskeiðis í 70'unum varð henda skipanin broytt, soleiðis at landskassin við bygging uttanlands veðbelt fyri 14% av samlaða kostnaðinum.

Meðan gongdin her heima og í Danmark í seinastuni hevur verið hon, at lánitíðin fyri nýbyggingar og størri umbyggingar er longd til 10 - 12 - 14 og 15 ár, er lánitíðin uttanlands í mongum førum stytt niður í 5—7 ár. Hetta saman við teimum broytingum, ið eru hendar síðani oljupríshækkingina í 1978/81, hevur borið við sær, at fleiri skip vegna ringa fígging eru um at fara av knóranum, og at fleiri eru farin. Í summum førum er vandi fyri, at skipið verður tikið út av landinum.

Kreppulánsskipanin hevur bøtt nakað um her, men hon er so háttað, at hon ofta bert loysir tað útlendska haftið fyri 1 og 2 terminir í senn. Tí metir minnilutin, at skulu vit sjálvir hava fulla avgerð um hvørji skip, tað samfelagsbúskaparliga er forsvarligt av veita hjálp, so mugu veðskuldarlánini liggja í Føroyum.

Hetta er galdandi undir verandi umstøðum hesa einu ferð, men kann lættliga broytast aftur. Tí skjýtur minnilutin upp, at henda loysn er knýtt at ávísari peningaupphædd, meðan veðhaldsheimildir landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar fyri útlendsk skipalán standa við.

At landskassin verður lánveitari, kann bera tann vanda í sær, at ov nógv kemur at hvíla á honum, og mælir tí flokkurin til, at gjaldsuttsetan ikki kann játtast veittum skilabótaláni, men at feløg, sum koma undir hesa skipan verða fyri somu reglum og metingum sum onnur, tá talan verður um almennar veitingar ella stuðul annars.

Á hendan hátt er landskassanum tryggjað so væl sum gjørligt, at endurfíggingarlánið verður afturrindað sum ætlað, meðan treytirnar fyri hjálp til einstaka felagið eru tær somu fyri øll. Skip kunnu tá framvegis fara av knóranum, bert er fulla avgerðin hesum viðvíkjandi flutt heim til Føroyar.

Í einstøkum føri kann tað vera fyrimunur búskaparliga sæð, at uttanlandsskuld verður burturbeind, við at skip verður tikið aftur av tiltendingum, men fyri tey skip, sum koma undir skipanina hava vit bert hendan valmøguleika einaferð, tí mælir minnilutin til, at serlánsnevndin heldur á við arbeiði sínum, so fortreytirnar fyri hesi meting kunnu vara so góðar sum gjørligt.

At tað umframt tørv á endurfíggingarláni uttanlands í løtuni er tørvur á nakað størri kreppulánsheimild enn galdandi 5 milj. kr., er helst rætt, og vil minnilutin tí taka undir við eini rímiligari hækking av hesi heimild í fíggjarárinum og mælir til, at samtykt verður fylgjandi

## Uppskot til

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.**

**lagtingslov om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.**

§ 1. Landsstýrinum verður heim-

§ 1. Landsstyret bemyndiges til

ilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 10 milj. kr.

sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1982/1983 at garantere for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i drifts vanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 10 mill.kr.

§ 2. Treytirnar fyri, at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

*a.* at líkindi eru til, at rakstur-in framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg,

*a.* at der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel,

*b.* at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella at fingin verða onnur lán, sum ikki mugu krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, ið landið veðheldur fyri sambært hesa lóg.

*b.* at egenkapitalen forhøjes med mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i henhold til denne lov.

§ 3. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Atli P. Dam tilskilar, at javnaðarflokkinum stendur greitt, at avmarkingar nú kunnu gerast í avskrivingarreglunum, uttan at fløguhugurin verður darvaður og mælir tí til at samtykt verður fylgjandi

**Uppskot
til
samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið í hesum árinum uppskot um slíkar avmarkingar í avskrivingarreglunum, at privat nýtsluøking við avskrivaðum peningi verður avmarkað mest møguligt og soleiðis, at gjørdar avskrivingar koma vinnuni til góðar.

2. viðgerð 17. september. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 18 - 0 atkvøðum, § 2 I og II til »At fingin verða« við 18 - 0 atkvøðum, restin av 1. stk. við 17-0 atkvøðum, II B samtykt við 17-0 atkvøðum og II C fall við 12 - 0 atkvøðum, § 3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 19 - 0 atkvøðum. Uppskot frá minnilutanum (Atli P. Dam og Ova Mikkelsen) fall við 13 - 0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Adolf V. Hansen) fall við 11 - 0 atkvøðum. Lógaruppskotið frá Atla P. Dam og Ova Mikkelsen §1 fall við 13-0 atkvøðum og uppskot til samtyktar frá Atla P. Dam samtykt við 21-0 atkvøðum.

Sama dag legði minnilutin (Adolf V. Hansen) fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

»Landsstýrinum er í serligum førum, har talan er um flakavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá reglini um kravið um 15%, sum nevnt er í stk. 1.«

Meirilutin í figgjarnevndini (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) legði fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| § 2 II c) verður orðað: | § 2 II c) formuleres: |
| Har talan er um fiskiskip har | Hvor der er talen om fiskeskibe |

einstaklingur, partsreiðarar ella líknandi eru ognarar at inngoldið er í minsta lagi út yvir kravda eginpeningin spardur skattur, sum stavar frá avskriving uppá skipið skattaárið 1982/83, og at nýinngoldin verða 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.

hvor enkeltpersoner, partsredere eller lignende er ejere, at der er indbetalt mindst ud over den udkrævede egenkapital sparet skat som stammer fra afskrivning på skibet skatteåret 1982/83, og at nyindbetalt bliver 10% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften.

3. viðgerð 17. september. Minnilutauppskotið frá Adolf V. Hansen varð samtykt við 17-0, meirilutauppskotið frá Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass varð samtykt við 18-0. Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1413-5-1

Lóg nr. 99 frá 30. september 1982.

# 6. Eykafíggjarløgtingslóg 1981/82.

Ár 1982, mánadag 13. september legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Eykafíggjarløgtingslóg fyri árið 1981/1982
## Lagtingslov om tillægsbevilling for året 1981/82

| | Inntøkur<br>Indtægter | Fíggjarløg-løgtingslóg 1981/82<br>Finanslag-tingslov<br>kr.<br>(1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1981/82<br>Tillægsbe-villing<br>kr.<br>(1.000) | Tilsamans<br>Ialt<br>kr.<br>(1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1** | **Skattir**<br>**Skatter** | | | |
| 0010 | Vanligur landsskattur .....<br>Sædvanlig landsskat | 365.000 | 51.416,7 | 416.416,7 |
| 0070 | Sjómansskatur .....<br>Sømandsskat | 9.000 | 1.939,7 | 10.939,7 |
| 0080 | Rentuskattur .....<br>Renteskat | 6.000 | 1.456,4 | 7.456,4 |
| 0090 | Vegskattur .....<br>Vejskat | 11.000 | 836,9 | 11.836,9 |
| | | 391.000 | 55.649,7 | 446.649,7 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 2** | **Toll- og framleiðslugjøld:**<br>**Told- og fremstillingsafgifter:** | | | |
| 0100 | Tollgjøld ..... | 351.000 | 34.731,4 | 385.731,4 |
| | Toldafgifter | | | |
| 0170 | Framleiðslugjøld ..... | 6.000 | 6.743,7 | 12.743,7 |
| | Fremstillingsafgifter | | | |
| | | 357.000 | 41.475,1 | 398.475,1 |
| **§ 3** | **Onnur gjøld**<br>**Andre udgifter** | | | |
| 0201 | Stuttleikagjøld (viðm.) ..... | ÷ 700 | 0 | ÷ 700 |
| | Forlystelsesafgifter (anm.) | | | |
| 0205 | Gjøld fyri spiritusskamtanarkort | 45 | 81,5 | 126,5 |
| | Afgifter for spiritusrationeringskort. | | | |
| 0210 | Loyvisgjøld ..... | 55 | 150,9 | 205,9 |
| | Afgifter for bevillinger | | | |
| 0220 | Arvagjøld ..... | 260 | 518,3 | 778,3 |
| | Arveafgift | | | |
| 0225 | Lestagjald ..... | 40 | 9,8 | 49,8 |
| | Skibsafgift | | | |
| 0250 | Bøtur ..... | 10 | ÷ 10,0 | 0,0 |
| | Bøder | | | |
| | | 410 | 750,5 | 1.160,5 |
| **§ 4** | **Inntøkur av spæli**<br>**Indtægter ved spil** | | | |
| 0301 | Happadrátturin ..... | 220 | 147,8 | 367,8 |
| | Lotteri | | | |
| 0305 | Burturlutingargjøld ..... | 40 | 46,3 | 86,3 |
| 0309 | V - 4 ..... | 0 | 119,5 | 119,5 |
| 0315 | Gjøld av vinningum uttanlands | 90 | ÷ 88,8 | 1,2 |
| | Afgifter af gevinster udenlands | | | |
| | | 350 | 224,8 | 574,8 |
| **§ 5** | **Rentur og vinuingsbýti v.m.**<br>**Renter og udbytte m.v.** | | | |
| 0400 | Rentuinntøkur ..... | 18.000 | ÷ 866,4 | 17.133,6 |
| | Renteindtægter | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 0450 | Rentuútreiðslur ..... | ÷49.000 | ÷12.482,3 | ÷61.482,3 |
| | Renteudgifter | | | |
| | | ÷31.000 | ÷13.348,7 | ÷44.348,7 |
| **§ 6** | **Landsstovnar** | | | |
| | **Landsvirksomheder** | | | |
| 0110 | Strandfaraskip landsins .... | ÷16.000 | ÷13.000,0 | ÷29.000,0 |
| | Lagtingets kystfart | | | |
| 0115 | Bussruturnar + samferðslu-nevnd | ÷1.766 | ÷67,7 | ÷1.833,7 |
| | Busruterne + samfærdsels-udvalget | | | |
| 0120 | Tjaldurs Apotek ..... | 126 | 0,0 | 126,0 |
| | Tjaldurs Apotek | | | |
| 0130 | Telefonverkið ..... | 1.442 | 0,0 | 1.442,0 |
| | Telefonværket | | | |
| 0140 | Útvarpið ..... | 461 | 45,0 | 506,0 |
| | Radiofonien | | | |
| 0145 | Postverkið ..... | ÷2.562 | ÷3.238,0 | ÷5.800,0 |
| | Postvæsenet | | | |
| 0150 | Oljugoymslur ..... | 578 | 173,7 | 751,7 |
| | Olieanlæg | | | |
| 0155 | Hvalastøðin við Áir ..... | ÷20 | ÷32,6 | ÷52,6 |
| | Hvalstationen | | | |
| 0157 | Stórahús við Air ..... | ÷66 | 60,1 | ÷5,9 |
| | Det store hus ved Áir | | | |
| | | ÷17.807 | ÷16.059,5 | ÷33.866,5 |
| **§ 7** | **Partur av avlopi danska tjóðarbankans sbrt. lóg** | | | |
| | **Andel i den danske nationalbanks overskud ifølge lov** | | | |
| 0501 | Partur av avlopi danska tjóðarbankans smb. lóg ..... | 2.500 | 21.433,9 | 23.933,9 |
| | Andel i den danske Nationalbanks overskud ifølge lov | | | |
| | | 2.500 | 21.433,9 | 23.933,9 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 8** | **Ymsar inntøkur**<br>**Diverse indtægter** | | | |
| 0510 | Ymsar inntøkur ..... | 5 | ÷ 2,3 | 2,7 |
| | Diverse indtægter | | | |
| | Samanløgd inntøka ..... | 702.458 | 90.123,5 | 792.581,5 |
| | Samlede indtægter | | | |
| | **Útreiðslur**<br>**Udgifter** | | | |
| **§ 10** | **Løgtingið**<br>**Lagtinget** | | | |
| 501 | Løgtingsmenn ..... | 4.715 | 799,1 | 5.514,1 |
| | Lagtingets medlemmer | | | |
| 510 | Løgtingið ..... | 410 | ÷ 115,3 | 294,7 |
| | Lagtingsbygningen | | | |
| 520 | Løgtingstíðindi og kunngerðasavn ..... | 321 | 290,4 | 611,4 |
| | Lagtingstidende og kundgørelsessamling | | | |
| 530 | Grannskoðan (extern) ..... | 60 | 10,2 | 70,2 |
| | Revision (extern) | | | |
| 540 | Grannskoðan (intern) ..... | 900 | 190,1 | 1.090,1 |
| | Revision (intern) | | | |
| 550 | Landsskattanevnd ..... | 56 | 13,5 | 69,5 |
| | Landsskatteudvalg | | | |
| 560 | Norrønt Ráð ..... | 25 | 13,5 | 38,5 |
| | Nordisk råd | | | |
| 570 | Norrønt samstarv ..... | 0 | 90,0 | 90,0 |
| | Nordisk samarbeide | | | |
| | | 6.487 | 1.291,5 | 7.778,5 |
| **§ 11** | **Landsfyrisitingin**<br>**Landsadministrationen** | | | |
| 1001 | Løgmaður og landstýri..... | 1.365 | ÷ 21,7 | 1.343,3 |
| | Lagmand og landsstyre | | | |
| 1101 | Landsskrivstova ..... | 4.472 | 322,5 | 4.794,5 |
| | Landskontor | | | |
| 1110 | Fiskivinnustova ..... | 601 | ÷ 8,6 | 592,4 |
| | Fiskerikontor | | | |
| 1120 | Uttanríkistænasta í Aberdeen | 331 | 36,0 | 367,0 |
| | Udenrigstjeneste i Aberdeen | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1125 | Uttanríkistænasta í København<br>Udenrigstjeneste i København | 417 | 22,4 | 439,4 |
| 1150 | Líkningarráð .....<br>Ligningsråd | 2.611 | 96,3 | 2.707,3 |
| 1160 | Manntalsstova .....<br>Folkeregister | 457 | 5,2 | 462,2 |
| 1170 | Almannastova .....<br>Socialforvaltning | 2.667 | 256,6 | 2.923,6 |
| 1180 | Landsskúlafyrisiting .....<br>Landsskoleadministration | 4.533 | ÷ 843,0 | 3.690,0 |
| 1201 | Gjaldstova.....<br>Oppebørselskontor | 7.965 | 4.290,5 | 12.255,5 |
| 1210 | Gjaldstovudeild í Klaksvík ..<br>Oppebørsfilial i Klaksvig | 554 | 44,3 | 598,3 |
| 1215 | Gjaldstovudeild í Saltangará .<br>Oppebørselsfilial i Saltangará | 429 | 2,6 | 431,6 |
| 1220 | Gjaldstovudeild í Fuglafirði .<br>Oppebørselsfilial i Fuglafirði | 256 | 19,9 | 275,9 |
| 1225 | Gjaldstovudeild á Tvøroyri .<br>Oppebørselsfilial i Tvøroyri | 408 | ÷ 4,0 | 404,0 |
| 1230 | Gjaldstovudeild í Vági .....<br>Oppbørselsfilial i Vági | 295 | 66,9 | 361,9 |
| 1231 | Gjaldstovudeild í Sørvági ...<br>Oppebørselsfilial i Sørvági | 295 | ÷ 9,5 | 285.5 |
| 1239 | Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald .....<br>Kontorgodtgørelse til syslerne | 20 | ÷ 13,3 | 6,7 |
| 1240 | Tolleftirlit .....<br>Toldvæsen | 2.228 | 146,9 | 2.374,9 |
| 1250 | Valuta- og prísráð .....<br>Valuta- og prisråd | 699 | ÷ 64,5 | 634,5 |
| 1260 | Lønarráð .....<br>Lønningsråd | 6 | + 2,3 | 3,7 |
| 1270 | Búskaparráð .....<br>Økonomisk råd | 1.470 | ÷ 79,2 | 1.390,8 |
| 1280 | Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands .....<br>Rejse- og dagpenge inden- og udenlands | 1.250 | 871,6 | 2.121,6 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1290 | Innheintingarútreiðslur ..... | 30 | 5,3 | 35,3 |
| | **Udgifter til inkasso** | | | |
| 1295 | **Ognin Tinganes** ..... | 906 | 198,3 | 1.104,3 |
| | Ejendommen Tinganes | | | |
| 1301 | **Landsverkfrøðingsskrivstovan** ..... | 5.789 | 1.027,9 | 6.816,9 |
| | **Landsingeniørkontor** | | | |
| | | 40.054 | 6.367,1 | **46.421,1** |
| **§ 12** | **Heilsumál** | | | |
| | **Sundhedsvæsen** | | | |
| 2010 | Landssjúkrahúsið (D.A.H.) . | 41.734 | 3.489,0 | 45.223,0 |
| | Landssygehuset (D.A.H.) | | | |
| 2020 | Klaksvíkar Sjúkrahús ..... | 10.327 | 541,9 | 10.868,9 |
| | Klaksvík Sygehus | | | |
| 2030 | Suðuroyar Sjúkrahús ..... | 5.160 | 479,5 | 5.639,5 |
| | Suðuroyar Sygehus | | | |
| 2040 | Heilsumiðstøðir, í grunn .... | 1.000 | 0 | 1.000,0 |
| | Sundhedscenter, henl. i fond | | | |
| 2050 | Læknar ..... | 395 | ÷ 4,5 | 390,5 |
| | Læger | | | |
| 2060 | Ljósmøður ..... | 385 | 61,2 | 446,2 |
| | **Jordemødre** | | | |
| 2065 | Heimasjúkrasystraskipan ... | 665 | ÷ 279,8 | 385,2 |
| | **Hjemmesygeplejeordning** | | | |
| 2090 | Ymiskar útreiðslur ..... | 444 | ÷ 39,3 | 404,7 |
| | Diverse udgifter | | | |
| | | 60.110 | 4.248,0 | 64.358,0 |
| **§ 13** | **Samferðslumál** | | | |
| | **Kommunikationsvæsen** | | | |
| 3900 | Nýggir vegir og brýr, breiðav brúm og umsiting av vegum (viðm.) ..... | 32.000 | 20.400,0 | 52.400,0 |
| | Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje (anm.) | | | |
| 3902 | Havnagerð, í grunn ..... | 25.000 | 0,0 | 25.000,0 |
| | Havnebygning, henl. i fond | | | |
| 3903 | Lendingar, í grunn ..... | 17.500 | 0,0 | 17.500,0 |
| | Landingspladser, henl. i fond | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3904 | Flogferðsla, í grunn ..... | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| | Flyvetrafik, henl. i fond | | | |
| 3906 | Berghols- og brúgvagerð, í grunn ..... | 4.000 | 0,0 | 4.000,0 |
| | Tunnel- og brobygning, henl. i fond | | | |
| 3907 | Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn ..... | 3.500 | 0,0 | 3.500,0 |
| | Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond | | | |
| 3908 | Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins ..... | 0 | 5.800,0 | 5.800,0 |
| | Postvæsenets bygge- og driftsfond | | | |
| | | 83.000 | 26.200,0 | 109.200,0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 14** | **Skúlamál** | | | |
| | **Undervisniugsvæsen** | | | |
| 2205 | Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið ..... | 300 | ÷ 183,4 | 116,6 |
| | **Fællesudgifter for skolevæsenet** | | | |
| 2210 | Fólkaskúlin ..... | 36.275 | 4.032,3 | 40.307,3 |
| | Folkeskolen | | | |
| 2215 | HF-skeið í Suðuroy ..... | 1.998 | 375,1 | 2.373,1 |
| | HF-kursus i Suðuroy | | | |
| 2216 | HF-skeið í Klaksvík og Gøtu . | 2.216 | 941,4 | 3.157,4 |
| | HF-kursus i Klaksvík og Gøta | | | |
| 2220 | Studentaskúlin ..... | 10.884 | 556,9 | 11.440,9 |
| | Gymnasium | | | |
| 2225 | Kostdeild Studentaskúlans .. | 1.287 | 794,5 | 2.081,5 |
| | Studenterskolens kostafdeling | | | |
| 2230 | Føroya Sjómansskúli ..... | 3.245 | ÷ 24,8 | 3.220,2 |
| | Færøernes Navigationsskole | | | |
| 2240 | Klaksvíkar Sjómansskúli ... | 1.340 | ÷ 556,3 | 783,7 |
| | Klaksvík Navigationsskole | | | |
| 2250 | Føroya Fólkaháskúli ..... | 1.212 | 133,5 | 1.345,5 |
| | Færøernes Folkehøjskole | | | |
| 2255 | Húshaldsskúlar ..... | 328 | 23,0 | 351,0 |
| | Husholdningsskoler | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2260 | Kvøldskúlar ..... | 1.072 | 201,1 | 1.273,1 |
| | Aftenskoler | | | |
| 2290 | Ítrótt | | | |
| | Idræt | | | |
| 3110 | Lánsgrunnur til ítróttaranlegg.. | 100 | 0,0 | 100,0 |
| | Lånefond til idrætsanlæg | | | |
| 3112 | Studningur til Í.S.F.(viðm.). | 850 | 0,0 | 850,0 |
| | Tilskud til Í.S.F. (anm.) | | | |
| 3113 | Studningur til ferðir innanoyggja ..... | 300 | 333,0 | 633,0 |
| | Tilskud til indenlands rejser | | | |
| 2295 | Ymiskur studningur ..... | 2.640 | 7.506,5 | 10.146,5 |
| | Diverse tilskud | | | |
| | | 64.047 | 14.132,8 | 78.179,8 |
| **§ 15** | **Vísindi, bókmentir og list ..** | | | |
| | **Videnskab, litteratur og kunst** | | | |
| 2310 | Lansbókasavn ..... | 1.853 | ÷ 115,6 | 1.737,4 |
| | Landsbibliotek | | | |
| 2320 | Fólkabókasøvn ..... | 2.252 | ÷ 106,6 | 2.145,4 |
| | Folkebiblioteker | | | |
| 2330 | Landsskjalasavn ..... | 766 | ÷ 59,7 | 706,3 |
| | Landsarkiv | | | |
| 2340 | Føroya Fornminnissavn .... | 2.324 | ÷ 82,4 | 2.241,6 |
| | Færøernes Museum | | | |
| 2350 | Bygdasøvn ..... | 135 | ÷ 35 | 100 |
| | Bygdemuseer | | | |
| 2355 | Fiskirannsóknarstovan ..... | 4.500 | 1.196,4 | 5.696,4 |
| | Fiskeribiologisk laboratorium | | | |
| 2365 | Fuglakanningarstøð v.m. ... | 18 | 5o,2 | 68,2 |
| | Ornitologisk station m.v. | | | |
| 2370 | Náttúrugripasavn ..... | 862 | 127,7 | 989,7 |
| | Naturhistorisk samling | | | |
| 2371 | DGU ..... | 290 | ÷ 45,5 | 244,5 |
| 2375 | Fróðskaparsetur Føroya .... | 3.555 | 96,9 | 3.651,9 |
| | Færøernes Akademi | | | |
| 2379 | Stovnar á Debessartrøð ..... | 822 | 14,1 | 836,1 |
| | Institutioner på Debessartrøð | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2380 | Heilsufrøðilig Starvstova ...<br>Hygiejnisk laboratorium | 1.182 | 134,8 | 1.316,8 |
| 2385 | Náttúrufriðingarnevndir ....<br>Naturfredningsudvalg | 80 | 68,7 | 148,7 |
| 2389 | Sangur og tónleikur .....<br>Sang og musik | 300 | 29,7 | 329,7 |
| 2390 | Ymiskir studningar .....<br>Diverse tilskud | 3.158 | 309,0 | 3.467,0 |
| | | 22.097 | 1.582,7 | 23.679,6 |

**§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.**
**Fiskeri, søfart o.l.**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2401 | Vrakarastovnur .....<br>Vragerinstitution | 1.311 | 214,0 | 1.525,0 |
| 2410 | Nautiskt Royndarkamar ....<br>Nautisk prøvekammer | 16 | ÷ 9,4 | 6,6 |
| 2420 | Sjómansheim (viðm.) .....<br>Sømandshjem (anm.) | 140 | 0,0 | 140,0 |
| 2430 | Vaktar- og bjargingarskip ...<br>Vagt- og bjærgningsskib | | | |
| 2431 | Vaktarskipið Tjaldur .....<br>Vagtskibet Tjaldur | 12.499 | ÷ 60,2 | 12.438,8 |
| 2433 | Vaktarskipið Ólavur Halgi ..<br>Vagtskibet Ólavur Halgi | | | |
| 2440 | Laksa- og sílaaling .....<br>Lakse- og ørreddrift | 600 | 425,7 | 1.025,7 |
| 2450 | Prísásetingarnevndin fyri salt- og ráfisk .....<br>Prisudvalget for salt- og råfisk | 100 | 39,0 | 139.0 |
| 2460 | Fiskivinnuráðið .....<br>Fiskerirådet | 192 | ÷ 60,5 | 131,5 |
| 2490 | Aðrir studningar<br>Andre tilskud | | | |
| 3301 | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna .<br>Minsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet | 206.000 | ÷1.490,6 | 204.509,4 |
| 3302 | Studningur til grunnin til endurnýggjan av skipaflotanum ..... | 12.000 | 0,0 | 12.000,0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Tilskud til fonden til fiskerflådens fornyelse | | | |
| 3303 | Grindir ..... Grindefangst | 5 | 82,3 | 87,3 |
| 3306 | Havrannsóknarskip, í grunn ..... Havundersøgelsesskib, henl. i fond | 400 | 0,0 | 400,0 |
| 3307 | Praktiskar fiskiroyndir Praktiske fiskeriforsøg | 2.500 | 139,9 | 2.639,9 |
| 3308 | Vaktarskip í grunn ... Vagtskib, henl. i fond | 100 | 0,0 | 100,0 |
| 3309 | Útróðrarstøðir í grunn . Hjemmefiskeristationer | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| 3310 | Trygdargrunnur veiðimanna ..... Fiskernes garantifond | 200 | ÷ 200.0 | 0,0 |
| 3730 | Landsstýrionum at ráða yvir ..... Landsstyret at råde over | 100 | 234,3 | 334,3 |
| | | 237.163 | ÷ 685,5 | 236.477,5 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 17** | **Landbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering** | | | |
| 2501 | Landsdjóralæknaembætið .. Landsdyrelægeembedet | 482 | 15,5 | 497,5 |
| 2504 | Landbúnaðarráðgevari ..... Landbrugskonsulent | 207 | 3,4 | 210,4 |
| 2505 | Seyðaráðgevari og seyðaroyndir Fåreavlskonsulent og fåreavlsforsøg | 115 | 9,2 | 124,2 |
| 2510 | Útskifting og matrikulstova . Udskiftning og matrikelkontor | 3.275 | 563,3 | 3.838,3 |
| 2520 | Royndarstøðin í Hoyvík .... Forsøgsstationen i Hoyvík | 1.063 | ÷ 111,1 | 951,9 |
| 2590 | **Aðrir studningar** ..... Andre tilskud | 12.150 | ÷ 219,7 | 11.930,3 |
| | | 17.292 | 260,6 | 17.552,6 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 18** | **Handil, idnaður o.t.**<br>**Handel, Industri m.v.** | | | |
| 2710 | Arbeiðseftirlit .....<br>Arbejdstilsyn | 826 | ÷ 29,9 | 796,1 |
| 2715 | Brandvenjingarstøðin við Áir | 0 | 227,5 | 227,5 |
| 2720 | Bileftirlit .....<br>Biltilsyn | 553 | ÷ 18,7 | 534,3 |
| 2723 | Ráðið fyri ferðslutrygd .....<br>Rådet for færdselssikkerhed | 200 | 0,0 | 200,0 |
| 2726 | Filmseftirlit .....<br>Filmstilsyn | 150 | ÷ 1,6 | 148,4 |
| 2730 | Skipaskrá og uppmáting ....<br>Skibsregister og opmåling | 15 | 64,7 | 79,7 |
| 2731 | Semingsmannaskipanin ....<br>Forligsinstitutionen | 35 | 50,8 | 85,8 |
| 2732 | Kolagrevstur .....<br>Kulbrydning | 400 | 531,5 | 931,5 |
| 2733 | Læruraðið .....<br>Lærerådet | 271 | ÷ 162,1 | 108,9 |
| 2734 | Skeiðvirksemi .....<br>Kursusvirksomhed | 115 | 18,8 | 133,8 |
| 2790 | Aðrir studningar<br>Diverse tilskud | | | |
| | 3501 Føroya Ferðamannafelag<br>Færøernes Turistforening | 150 | 0,0 | 150,0 |
| | 3502 Stuðul til idnaðarfremjandi endamál .....<br>Støtte til industrifremmende formål | 2.250 | ÷ 1.237,1 | 1.012,9 |
| | 3503 At leggja í Gistingarhúsgrunn .....<br>Henlæggelse i hotelfonden | 600 | 0,0 | 600,0 |
| | 3504 Til menningargrunn ..<br>Til udviklingsfond | 4.500 | 3.500,0 | 8.000,0 |
| | 3506 Studningur til meistarar<br>Tilskud til mestere | 2.000 | ÷ 690,9 | 1.309,1 |
| 3730 | Landsstýrinum at ráða yvir .....<br>Landsstyret at råde over | 75 | 35,4 | 110,4 |
| | | 12.140 | 2.288,4 | 14.428,4 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 19** | **Almenn forsorg v.m.**<br>**Sosialvæsen m.v.** | | | |
| 2805 | Fólkapensjón .....<br>Folkepension | 47.835 | 4.489,8 | 52.324,8 |
| 2810 | Avlamispensión .....<br>Invalidepension | 18.230 | 2.132,7 | 20.362,7 |
| 2820 | Barnastyrkur til stakar uppihaldarar .....<br>Børnebidrag til enlige forsørgere | 1.000 | 384,0 | 1.384,0 |
| 2830 | Einkjupensjón .....<br>Enkepension | 2.560 | ÷ 1.470,5 | 1.089,5 |
| 2840 | Vanlig forsorg .....<br>Almindelig forsorg | 1.565 | ÷ 175,9 | 1.389,1 |
| 2845 | Víðkað hjálp .....<br>Udvidet hjælp | 580 | 65,2 | 1.235,2 |
| 2850 | Einkjuhjálp .....<br>Enkehjælp | 1.865 | 831,5 | 2.696,5 |
| 2855 | Barnaforsorg .....<br>Børneforsorg | 2.520 | 886,3 | 3.406,3 |
| 2860 | Umsiting av heimahjálparaskipanini .....<br>Administration af hjemmehjælpsordn. | 10.000 | 1.552,3 | 11.552,3 |
| 2865 | Dagpeningaskipanin .....<br>Dagpengeordningen | 6.400 | 2.456,8 | 8.856,8 |
| 2866 | Frítíðarheimið í Skrivaragøtu<br>Fritidshjemmet i Skrivaragøtu | 0 | 534,9 | 534,9 |
| 2870 | Heimasjúkrasystraskipanin .<br>Hjemmesygeplejerskeordningen | 0 | 0 | 0 |
| 2875 | Brennistudningur til pensionistar .....<br>Brændselstilskud til pensionister | 0 | 3,596,1 | 3.596,1 |
| 2890 | Ymisir studningar .....<br>Forskellige tilskud | 18.008 | 205,7 | 18.213,7 |
| | | 110.563 | 16.078,9 | 126.641,9 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 20** | **Pensjónsútreiðslur**<br>**Pensionsudgifter** | | | | |
| 2901 | Pensjónsútreiðslur<br>pensionsudgifter | | | | |
| | 1060 | Eftirlønir ..... | 500 | 120,3 | 620,3 |
| | | Pensioner | | | |
| | 1061 | Biðipeningur..... | 1.000 | 378,6 | 1.378,6 |
| | | Ventepenge | | | |
| | 1062 | Tænastumannaeftirlønir | 1.319 | 68,8 | 1.387,8 |
| | | Tjenestemandspensioner | | | |
| | | | 2.819 | 567,7 | 3.386,7 |
| **§ 21** | **Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn**<br>**Effektive garantiforpligtelser, i fond** | | | | |
| 2902 | Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn ..... | | 6.000 | 0,0 | 6.000 |
| | Effektive garantiforpligtelser, i fond | | | | |
| | | | 6.000 | 0,0 | 6.000 |
| **§ 22** | **Aðrar og óvissar útreiðslur**<br>**Andre og uvisse udgifter** | | | | |
| 2910 | Aðrar og óvissar útreiðslur<br>Andre og uvisse udgifter | | | | |
| | 2050 | Umboðan ..... | 300 | 222,9 | 522,9 |
| | | Repræsentation | | | |
| | 2570 | Útreiðslur av vali ..... | 50 | 33,7 | 83,7 |
| | | Udgifter vedrørende valg | | | |
| | 2575 | Dóms- og løgreglumál . | 20 | - 15,2 | 4,8 |
| | | Retsvæsen og politi | | | |
| | 2580 | Studningur til politiskt upplýsingararbeiði v.m. | 740 | 0,0 | 740,0 |
| | | Tilskud til politisk oplysningsarbejde m.m. | | | |
| 3730 | Landsstýrinum at ráða yvir | | 350 | 119,3 | 469,3 |
| | Landsstyret at råde over | | | | |
| | | | 1.460 | 360,7 | 1.820,7 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 23** | **At leggja í ymsar grunnar v.m.**<br>**Henlægges til forskellige fonds m.m** | | | |
| 3801 | Avlopið hjá apotekinum lagt í apotekgrunnin .....<br>Apotekets overskud henlagt til apotekfonden | 126 | 0,0 | 126,0 |
| 3805 | Avlopið hjá telefonverkinum .<br>Telefonværkets overskud | 1.442 | 0,0 | 1.442,0 |
| 3806 | Avlop hjá Postverki Føroya .<br>Postvæsnets overskud | ÷ 2.562 | ÷ 3.238,0 | ÷ 5.800,0 |
| 3810 | Avlopið hjá útvarpinum ....<br>Radiofoniens overskud | 461 | 45,0 | 506,0 |
| 3815 | Til kirkjugrunnin .....<br>Til kirkefonden | 1.825 | 0,0 | 1.825,0 |
| | | 1.292 | ÷ 3.193,0 | ÷ 1.901,0 |
| **§ 24** | **Burturleggingar til avdráttir av lánum**<br>**Henlæggelser til afdrag på lån** | | | |
| 2930 | Burturleggingar til avdráttir av lánum .....<br>Hennlæggelser til afdrag på lån | 0 | 0,0 | 0,0 |
| | | 0 | 0,0 | 0,0 |
| **§ 25** | **Avskrivingar**<br>**Afskrivinger** | | | |
| 2490 | Avskrivingar<br>Afskrivinger | 36.857 | 0,0 | 36.857,0 |
| | | 36.857 | 0,0 | 36.857,0 |
| **§ 26** | **Ymsar ognarútreiðslur**<br>**Diverse ejendomsudgifter** | | | |
| 2950 | Ymsar ognarutreiðslur (kt. 1330 § 11) .....<br>Diverse ejendomsudgigter | 150 | ÷ 49,1 | 100,9 |
| | Samanlagdar útreiðslur .....<br>Udgifter ialt | 701.531 | 69.450,8 | 770.981,8 |
| | Munur<br>Difference | + 927 | 20.672,7 | 21.599,7 |
| | | 702.458 | 90.123,5 | 792.581,5 |

**Útreiðslurnar undir teimum einstøku útreiðslugreinunum hava verið fylgjandi:**

| | | Játtan (1.000 kr.) | Meirútreiðslur (1.000 kr.) | Útreiðslur tilsamans (1.000 kr.) |
|---|---|---|---|---|
| § 10 | Løgtingið | 6.487 | 1.291,5 | 7.778,5 |
| § 11 | Landsumsitingin | 40.054 | 6.367,1 | 46.421,1 |
| § 12 | Heilsumál | 60.110 | 4.248,0 | 64.358,0 |
| § 13 | Samferðslumál | 83.000 | 26.200,0 | 109.200,0 |
| § 14 | Skúlamál | 64.047 | 14.132,8 | 78.179,8 |
| § 15 | Vísindi, bókmentir og list | 22.097 | 1.582,7 | 23.679,7 |
| § 16 | Fiskivinna, sigling o.t. | 237.163 | ÷ 685,5 | 236.477,5 |
| § 17 | Landbúnaður og matrikulering | 17.292 | 260,6 | 17.552,6 |
| § 18 | Handil, idnaður o.t. | 12.140 | 2.288,4 | 14.428,4 |
| § 19 | Almenn forsorg v.m. | 110.563 | 16.078,9 | 126.641,9 |
| § 20 | Pensjónsútreiðslur | 2.819 | 567,7 | 3.386,7 |
| § 21 | Effektivar veðhaldsbindingar í grunn | 6.000 | 0,0 | 6.000,0 |
| § 22 | Aðrar og óvissar útreiðslur | 1.460 | 360,7 | 1.820,7 |
| § 23 | At leggja í ymsar grunnar v.m. | 1.292 | ÷ 3.193,0 | ÷ 1.901,0 |
| § 24 | Burturleggingar til avdráttir av lánum | 0 | 0,0 | 0,0 |
| § 25 | Avskrivingar | 36.857 | 0,0 | 36.857,0 |
| § 26 | Ymsar ognarútreiðslur | 150 | ÷ 49,1 | 100,9 |
| | | 701.531 | 69.450,8 | 770.981,8 |

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið leggur við hesum fyri løgtingið uppskot til eykafíggjarlóg fyri fíggjarárið 1981/1982.

A eykafíggjarlógini eru:

1. Inntøkur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftan á samtykt fíggjarlógarinnar.
2. Útreiðslur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftan á samtykt fíggjarlógarinnar.
3. Útreiðslur, ið hvørki høvdu heimild í fíggjarlógini ella í øðrum lógum, men sum hava fingið fyribils játtan fíggjarnevndarinnar.
4. Bæði inntøkur og útreiðslur, ið standast av ávikavist broyttum inntøkuviðurskiftum og broyttum útreiðsluviðurskiftum aftaná, at fíggjarlógin varð samtykt, ella bert av tí, at ikki hevur verið rætt mett um inntøkur og útreiðslur, tá fíggjarlógin varð samtykt.

Eftir uppskotinum eru samanlagdar inntøkur settar til 792.581.500 kr., meðan samanlagdar útreiðslur eru settar til 770.981.800 kr., soleiðis at inntøkumunur verður upp á samanlagt 21.599.700 kr.

Inntøkan á eykafíggjarlógini 90.123.500 kr. er 12,8% hækking samanborið við inntøkutalið á sjálvari fíggjarlógini, sum var 702.458.000 kr.

Skattaálíkningin fyri 1981/82 var 51.416.700 kr. meira enn mett á fíggjarløgtingslógini, meðan tollurin og framleiðslugjøldini vóru 41.475.100 kr. meira enn mett.

Útreiðslan á eykafíggjarlógini 69.450.800 kr. er 9,9% hækking samanborið við útreiðslutalið á sjálvari fíggjarløgtingslógini, sum var 701.531.000 kr.

Í fíggjarárinum hækkaði prístalið við 15,2 stigum og almennu lønirnar við umleið 12%.

**§6 — 0110 Strandfaraskip Landsins**

Á fíggjarlógini 1981/82 var játtanin til Strandfaraskip Landsins 16 mió. kr. Brúktar eru 29 mió. kr. Av meirnýtsluni uppá 13 mió. kr. eru 8 mió. kr. játtaðar í fíggjarárinum.

**§10 — 520 Løgtingstíðindi og kunngerðasavn**

Meirnýtslan upp á 290.400 kr. ella 90% stavar frá, at tilrættalegging og prenting, sum vóru komin í afturhond nú eru ájour og eru prentað í hesum fíggjarárinum.

**§10 — 540 Intern grannskoðan**

Meirnýtslan uppá 190.100 kr. ella 21% stavar frá, at 52.100 kr. eru brúktar meir enn játtað til løn/starvsfólk, 52.600 kr. meir enn játtað til úrtíðarlønir og 66.900 kr. meir enn játtað til reingerð.

**§10 — 550 Landsskattanevndin**

Meirnýtslan upp á 24% stavar frá, at 15.000 kr. eru brúktar meir enn játtað til samsýningar.

**§10 — 570 Norrønt samstarv**

Tær 90.000 kr., sum eru nýttar av hesi konto, eru játtaðar av fíggjarnevndini í fíggjarárinum 1981/82 og brúktar til Vest-Norden projektið.

**§11 — 1201 Gjaldstovan**
Meirnýtslan hjá Føroya Gjaldstovu var 4.290.500 kr., ella 54%, av hesum stava

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 385.900 | kr. | frá | konto | 1014 | løn/starvsfólk, |
| 443.100 | — | — | — | 1015 | løn/avloysarar |
| 199.900 | — | — | — | 1040 | úrtíðarløn |
| 361.900 | — | — | — | 2355 | úrtíðarlønir |

930.700 — stava frá, at ríkið nú ikki rindar endurgjald til rakstur av gjaldstovuni,
793.063 — frá konto 2355 og 2358 EDV og
1.143.229 — konto 2359 EDV projektið á skattadeildini.

Meirnýtslan á konto 2355 og 2358 til EDV uppá tilsamans 793.963 kr. stavar meginpartin frá, at tað í uppskotinum til fíggjarlóg 1981/82 varð roknað við, at veggjald og landskassalønir fóru at verða yvirtikin frá p/f Data og løgd inn á tað nýggja edv-anleggið á gjaldstovuni. Orsakað av edv-umleggingini á skattadeildini var hetta ikki gjørt, og sostatt var tað neyðugt at halda fram við samarbeiðinum av arbeiðsøkjunum hjá p/f Data, hóast eingin játtan var til hetta. 580.000 kr. av meirnýtsluni stava frá nevndu orsøk.

Hin høvuðsorsøkin til meirnýtsluna er, at edv-virki ikki rindaðu toll upp á edv-tól, tá ið gjaldstovan fór undir edv-projektið og keyp av tólum, tí varð ikki roknað við tollútreiðslum. Lógarbroytingin ber við sær, at gjaldstovan skuldi rinda umleið 400.000 kr. í tolli.

Á konto 2359 eru brúktar 1.143.229 kr. til EDV-projektið á skattadeildini. Av hesum eru 650.000 játtaðar av fíggjarnevndini.

Ein av høvuðsorsøkunum er tann stóra eykaútreiðslan til konsulenthjálp upp á 400.000 kr. Orsøkin er m.a. tann, at arbeiðið hjá Norsk Data (edv-tólini eru frá Norsk Data) við installatión av edv-tólunum og at fáa tey at rigga gekk so illa, at mánaðir gingu, áðrenn tólini koyrdu stabilt og álítandi. Hetta førdi við sær, at ongar tíðar- og arbeiðsætlanir hildu.

**§11 — 1290 Ferða- og dagpeningur**
Meirnýtslan til ferða- og dagpening var 871.600 kr. ella 70%.

**§11 — 1295 Ognin Tinganes**
Meirnýtslan var 198.200 kr. ella 22%. Meginparturin av hesum var brúkt til umvælingar og reingerð.

Til umvælingar v.m. var brúkt 101.000 kr. meir enn játtað og til reingerð 75.000 kr. meir enn játtað.

**§11 — 1301 Landsverkfrøðingsskrivstovan**
Meirnýtslan til landsverkfrøðingsskrivstovuna var 1.027.900 kr. ella 18%. Meginparturin var brúktur til løn/sáttmálalønt, har brúktar vóru 399.200 kr. meir enn játtað, til leiguútreiðslur, har brúktar vóru 374.200 kr. meir enn játtað, og til kilometraendurgjald, har eingin peningur var játtaður, men brúktar vóru 207.800 kr.

**§12 — 2010 Landssjúkrahúsið**

| | | |
|---|---|---|
| Brúkt í 1981/82 | | 45.223.000 kr.[1] |
| Játtan í 1981/82 | 41.734.000 kr. | |
| Eykajáttan í fíggjarárinum | 3.134.000 — | 44.868.000 — |
| Meirnýtsla í 1981/82 | | 355.000 kr. |

1) Fyribilstøl

**§12 — 2020 Klaksvíkar sjúkrahús**

| | | |
|---|---|---|
| Brúkt í 1981/82 | | 10.845.000 kr.[1] |
| Játtan í 1981/82 | 10.327.000 kr. | |
| Eykajáttan í fíggjarárinum | 1.031.000 — | 11.358.000 — |
| Minni nýtt enn játtað í 1981/82 | | ÷ 513.000 kr. |

1) Fyribilstøl.

**§12 — 2030 Suðuroyar sjúkrahús**

| | | |
|---|---|---|
| Brúkt í 1981/82 | | 5.640.000 kr. |
| Játtan í 1981/82 | 5.160.000 kr. | |
| Eykajáttan í fíggjarárinum | 612.000 — | 5.772.000 — |
| Minni nýtt enn játtað 1981/82 | | ÷ 132.000 kr. |

**§13 — 3900 Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúni og umsiting av vegum:**

| | | |
|---|---|---|
| Nýttur peningur til vegir v.m. | | 102.700.000 kr. |
| Játtan (§13-1) nýggir vegir, vegaumsiting v.m. | 32.000.000 kr. | |
| §41-2 fíggjan við láni | 43.000.000 — | |
| kommunanna partur | 7.300.000 — | 82.300.000 kr. |
| | | 20.400.000 kr. |

Nýttar eru sostatt 20.400.000 kr. meir, enn játtaðar eru á fíggjarlógini.

Grunnurin fyri bergholds- og brúgvagerð 4,0 mió. kr. er ikki tikin við vegna tess, at hann skal standa sum trygd fyri keypi av útgerð til Lorvíkarbergholið.

**§14 — 2215 HF-skeið í Suðuroy**

Meirnýtslan uppá 375.100 kr. ella 19% stavar meginpartin frá meirnýtslu til lønir og ferða- og dagpening. Til tímaløn og úrtíðarløntir er meirnýtslan ávikavist 168.800 kr. og 278.400 kr., harafturímóti eru brúktar 110.200 kr. minni enn játtað til løn/sáttmálaløtit.

Til ferða- og dagpening eru 74.400 kr. brúktar meir enn játtað.

**§14 — 2216 HF-skeið í Klaksvík og Gøtu**

Meirnýtslan uppá 941.400 kr. ella 42% stavar frá lønum og ferðadagpeningi.

| | |
|---|---|
| Til løn/sáttmálaløtit | eru brúktar 212.300 kr. meir enn játtað, |
| til tímaløtit | eru brúktar 170.300 kr. meir enn játtað, |
| til úrtíðarløntir | eru brúktar 496.000 kr. meir enn játtað, |
| og til ferða- og dagpening | eru brúktar 100.200 kr. meir enn játtað. |

**§14 — 2225 Kostdeild Studentaskúlans**

Meirnýtslan er uppá 794.500 kr. ella 62%.

Meirnýtslan til løn/onnur er 390.600 kr. Til el, hita og vask 158.700 kr. og aðrar umsitingarútreiðslur 270.000 kr. Harafturímóti er næringagjaldið 89.100 kr. hægri enn mett í fíggjarlógini.

**§14 — 2260 Kvøldskúlar**

Meirútreiðslurnar hava landskassanum viðvíkjandi verið uppá 201.100 kr. ella 19%. Hetta kemst av øktum aktiviteti á kvøldskúlaøkjum.

**§14 — 2290/3113 Studningur til ferðir innanoyggja**

Meirnýtslan á hesi konto var 330.000 kr. ella 111%.

**§15 — 2355 Fiskirannsóknarstovan**

Meirútreiðslan uppá 1.196.400 kr. ella 27% stavar frá meirútreiðsluni til m/s »Magnus Heinason« uppá 1.114.400 kr. og til løn/sáttmálaløtit 148.000 kr.

**§ 15 — 2365 Fuglakanningarstøð**
Til fuglakanningarstøð eru játtaðar 18.000 kr., meðan nýtslan hevur verið 68.204 kr.

**§ 15 — 2370 Føroya Náttúrugripasavn**
Í mun til játtanina á fíggjarløgtingslógini hevur Náttúrugripasavnið nýtt 127.700 kr. ella 15% meira.

Meirnýtslan til løn/sáttmálaløut er 69.800 kr., meðan nýtslan til løn/onnur er 21.000 kr. minni enn játtað.

Til el, hita og vask eru brúktar 35.900 kr. meir enn játtað, og til kanningar- og savnsarbeiði eru brúktar 45.700 kr. meir enn játtað.

**§ 15 — 2380 Heilsufrøðilig starvsstova**
Meirnýtslan, sum fyri stovnin er 134.800 kr. ella 111%, stavar frá rannsóknum, har játtaðar eru 50.000 kr., meðan 178.600 kr. eru brúktar.

**§ 15 — 2385 Náttúrufriðingarnevndin**
Av meirnýtsluni uppá 68.700 kr. ella 86% eru 67.500 kr. brúktar til samsýningar.

**§ 16 — 2401 Vrakarastovnurin**
Meirnýtslan er 214.100 kr. ella 16%. Í árinum eru brúktar meir enn játtað 157.500 kr. til lønir til tænastumenn, 28.500 kr. løn til avloysarar og 31.300 kr. til ferða- og dagpening.

**§ 16 — 2440 Laksa- og sílaaling**
Á hesi konto vóru játtaðar 600.000 kr. Brúktar eru 1.025.720 kr. Munurin 425.700 kr. er játtaður í fíggjarárinum.

**§ 16 — 2450 Prísásetingarnevndir fyri saltfisk**
Meirnýtslan er á hesi konto 39.000 kr. ella 39%. Brúktar eru 59.800 kr. meir enn játtað til aðrar skrivstovuútreiðslur, meðan 22.700 kr. eru brúktar minni enn játtað til samsýningar.

**§ 18 — 2715 Brandvenjingarstøð við Áir**
Í fíggjarárinum eru brúktar 227.500 kr. til brandvenjingarstøðina við Áir.

Peningurin er játtaður av fíggjarnevndini.

**§ 18 — 2730 Skipaskrá og -uppmáling**
Meirnýtslan á hesi konto er 64.700 kr. ella 431%. Játtaðar á fíggjarløgtingslógini eru bert 15.000 kr.

Til løn/onnur eru brúktar 6.300 kr. meir enn játtað,
til samsýningar eru brúktar 9.100 kr. meir enn játtað,
til leiguútreiðslur eru brúktar 6.500 kr. meir enn játtað.

**§ 18 — 2731 Semingsmannaskipanin**
Meirnýtslan er 50.800 kr. ella 145%. Meirnýtslan stavar frá samsýningum og øðrum útreiðslum, við tað at í 1981/82 var brúk fyri semingsstovninum meira enn vanligt.

**§ 18 — 2732 Kolagrevstur**
Á hesi konto eru brúktar 531.500 kr. ella 133% meir enn játtað.

**§ 19 — 2805 Fólkapensjón**
Meirnýtslan er 4.489.800 kr. ella 9%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

**§ 19 — 2810 Avlamispensjón**
Meirnýtslan er 2.132.700 kr. ella 12%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

**§ 19 — 2820 Barnastyrkur til stakar uppihaldarar**
Meirnýtslan er upp á 384.000 kr. ella 38%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

**§ 19 — 2845 Víðkað hjálp**
Meirnýtslan er 655.200 kr. ella 113%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

**§ 19 — 2850 Einkjuhjálp**
Meirnýtslan er 831.500 kr. ella 45%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

**§ 19 — 2855 Barnaforsorg**
Meirnýtslan er 886.300 kr. ella 35%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

**§ 19 — 2860 Heimahjálparskipanin**
Meirnýtslan upp á 1.552.300 kr. ella 16% stavar frá hækkaðum lønum og hækkaðum tali av klientum.

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. aprfl | 1979 | var talið av klientum | 480 | og talið av heimahjálparum | | 240 |
| 15. mars | 1980 | — — — — | 610 | — — — — | | 330 |
| 15. sept. | 1980 | — — — — | 661 | — — — — | | 380 |
| 15. juni | 1981 | — — — — | 732 | — — — — | | 380 |
| 1. jan. | 1982 | — — — — | 771 | — — — — | | 402 |

**§19 — 2865 Dagpeningsskipanin**

Meirýtslan er upp á 2.456.800 kr. ella 38%. At meta um útreiðslur til dagpeningsskipanina á fíggjarløgtingslógini kann vera torført, tí útreiðslurnar eru lógbundnar og kunnu vera ymiskar ár frá ári. Nevnast skal, at landsstýrið heystið 1981 samtykti at regulera dagpeningsskipanina, soleiðis at dagpeningur verður roknaður av lønini + 9 1/2%. Útreiðslurnar av reguleringini vóru fyri landskassans viðkomandi umleið 1/2 mió. kr. Eisini gjørdi broytta útrokningin av dagpeningi 1. ársfjórðing í 1982 dýrari fyri dagpeningsskipanina.

1. viðgerð 16. september. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1983 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 13. september 1982 og undir 1. viðgerð tann 16. september beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskoti landsstýrisins eru samanlagdar inntøkur settar til kr. 792.581.500,-, meðan samanlagdar útreiðslur eru settar til kr. 770.981.500,-, soleiðis at inntøkumunur verður upp á samanlagt kr. 21.599.700,-.

Landsstýrið hevur í viðmerkingum sínum greitt frá inntøku- og útreiðsluviðurskiftunum og hevur tilskilað frágreiðingar um meirnýtslurnar, har farið er út um játtan ella eykajáttan.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini eru spurningar settir um ymiskar postar í roknskapinum.

Víst er á skeivleikar, ið verða rættaðir.

Tá broytingar eru gjørdar í bókingunum, aftaná at uppskot landsstýrisins er lagt fram, hevur fíggjarnevndin broytingaruppskot til lógaruppskotið, soleiðis at tølini í uppískoytisjáttanini 1981/82 verða bein.

Serliga er talan um bóking av kr. 9.333.475,48 á §15-2372. Jarðfrøðiligar boringar.

Landsstýrið hevur í hesum føri í skrivi frá 8. mars 1983 til fíggjarnevndina biðið um, at nevnda upphædd kemur við á eykafíggjarlógina 1981/82. (skjalið er viðlagt).

Endaligu tølini á inntøkusíðuni verða sostatt kr. 794.051.700 og á útreiðslusíðuni kr. 780.485.600,-, soleiðis at endaligi inntøkumunurin verður kr. 13.566.100,-.

Fíggjarnevndin setir sostatt fram soljóðandi broytingaruppskot í heilum lúki til uppskot landsstýrisins.

# Eykafíggjarløgtingslóg fyri árið 1981/1982
# Lagtingslov om tillægsbevilling for året 1981/82

| | Inntøkur<br>Indtægter | Fíggjarløg-løgtingslóg 1981/82 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1981/82 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1** | **Skattir**<br>**Skatter** | | | |
| 0010 | Vanligur landsskattur .....<br>Sædvanlig landsskat | 365.000 | 51.408,9 | 416.408,9 |
| 0070 | Sjómansskatur .....<br>Sømandsskat | 9.000 | 1.925,6 | 10.925,6 |
| 0080 | Rentuskattur .....<br>Renteskat | 6.000 | 1.441,3 | 7.441,3 |
| 0090 | Vegskattur .....<br>Vejskat | 11.000 | 838,5 | 11.838,5 |
| | | 391.000 | 55.614,3 | 446.614,3 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 2** | **Toll- og framleiðslugjøld:**<br>**Told- og fremstillingsafgifter:** | | | |
| 0100 | Tollgjøld ..... | 351.000 | 34.734,4 | 385.734,4 |
| | Toldafgifter | | | |
| 0170 | Framleiðslugjøld ..... | 6.000 | 6.980,9 | 12.980,9 |
| | Fremstillingsafgifter | | | |
| | | 357.000 | 41.715,3 | 398.715,3 |
| **§ 3** | **Onnur gjøld**<br>**Andre udgifter** | | | |
| 0201 | Stuttleikagjøld (viðm.) ..... | · 700 | 0 | ·788.5 |
| | Forlystelsesafgifter (anm.) | | | |
| 0205 | Gjøld fyri spiritusskamtanarkort | 45 | 81,5 | 126,5 |
| | Afgifter for spiritusrationeringskort. | | | |
| 0210 | Loyvisgjøld ..... | 55 | 150,9 | 205,9 |
| | Afgifter for bevillinger | | | |
| 0220 | Arvagjøld ..... | 260 | 518,3 | 778,3 |
| | Arveafgift | | | |
| 0225 | Lestagjald ..... | 40 | 9,8 | 49,8 |
| | Skibsafgift | | | |
| 0250 | Bøtur ..... | 10 | ÷7,5 | 2,5 |
| | Bøder | | | |
| | | 410 | 753,0 | 1.163,0 |
| **§ 4** | **Inntøkur av spæli**<br>**Indtægter ved spil** | | | |
| 0301 | Happadrátturin ..... | 220 | 147,8 | 367,8 |
| | Lotteri | | | |
| 0305 | Burturlutingargjøld ..... | 40 | 46,3 | 86,3 |
| | Lotteriafgifter | | | |
| 0309 | V - 4 ..... | 0 | 119,5 | 119,5 |
| 0315 | Gjøld av vinningum uttanlands . | 90 | ÷88,8 | 1,2 |
| | Afgifter af gevinster udenlands | | | |
| | | 350 | 224,8 | 574,8 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 5** | **Rentur og vinningsbýti v.m.**<br>**Renter og udbytte m.v.** | | | |
| 0400 | Rentuinntøkur .....<br>Renteindtægter | 18.000 | ÷ 7.543,7 | 25.543,7 |
| 0450 | Rentuútreiðslur .....<br>Renteudgifter | ÷ 49.000 | ÷ 12.485,7 | ÷ 61.485,7 |
| | | ÷ 31.000 | ÷ 4.942,0 | ÷ 35.942,0 |
| **§ 6** | **Landsstovnar**<br>**Landsvirksomheder** | | | |
| 0110 | Strandfaraskip landsins .....<br>Lagtingets kystfart | ÷ 16.000 | ÷ 14.253,8 | ÷ 30.253,8 |
| 0115 | **Bussruturnar + samferðslu-nevnd .....**<br>**Busruterne + samfærdsels-udvalget** | ÷ 1.766 | ÷ 75,3 | ÷ 1.841,3 |
| 0120 | Tjaldurs Apotek .....<br>Tjaldurs Apotek | 126 | 242,7 | 368,7 |
| 0130 | Telefonverkið .....<br>Telefonværket | 1.442 | ÷ 6.142,4 | ÷ 4.700,4 |
| 0140 | Útvarpið .....<br>Radiofonien | 461 | 15,6 | 476,6 |
| 0145 | Postverkið .....<br>Postvæsenet | ÷ 2.562 | ÷ 3.203,1 | ÷ 5.765,1 |
| 0150 | Oljugoymslur .....<br>Olieanlæg | 578 | 173,7 | 751,7 |
| 0155 | **Hvalastøðin við Áir .....**<br>**Hvalstationen** | ÷ 20 | ÷ 32,6 | ÷ 52,6 |
| 0157 | Stórahús við Áir .....<br>Det store hus ved Áir | - ÷ 66 | 71,9 | 5,9 |
| | | ÷ 17.807 | ÷ 23.203,3 | ÷ 41.010,3 |
| **§ 7** | **Partur av avlopi danska tjóð-arbankans sbrt. lóg**<br>**Andel i den danske national-banks overskud ifølge lov** | | | |
| 0501 | Partur av avlopi danska tjóð-arbankans smb. lóg .....<br>Andel i den danske National-banks overskud ifølge lov | 2.500 | 21.433,9 | 23.933,9 |
| | | 2.500 | 21.433,9 | 23.933,9 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 8** | **Ymsar inntøkur**<br>**Diverse indtægter** | | | |
| 0510 | Ymsar inntøkur ..... | 5 | ÷ 2,3 | 2,7 |
| | Diverse indtægter | | | |
| | Samanløgd inntøka ..... | 702.458 | 91.593,7 | 794.051,7 |
| | Samlede indtægter | | | |
| | **Útreiðslur**<br>**Udgifter** | | | |
| **§ 10** | **Løgtingið**<br>**Lagtinget** | | | |
| 501 | Løgtingsmenn ..... | 4.715 | 799,1 | 5.514,1 |
| | Lagtingets medlemmer | | | |
| 510 | Løgtingið ..... | 410 | ÷ 34,4 | 375,6 |
| | Lagtingsbygningen | | | |
| 520 | Løgtingstíðindi og kunngerðasavn ..... | 321 | 304,1 | 625,1 |
| | Lagtingstidende og kundgørelsessamling | | | |
| 530 | Grannskoðan (extern) ..... | 60 | 2,0 | 62,0 |
| | Revision (extern) | | | |
| 540 | Grannskoðan (intern) ..... | 900 | 109,2 | 1.009,2 |
| | Revision (intern) | | | |
| 550 | Landsskattanevnd ..... | 56 | 13,5 | 69,5 |
| | Landsskatteudvalg | | | |
| 560 | Norrønt Ráð ..... | 25 | 13,5 | 38,5 |
| | Nordisk råd | | | |
| 570 | Norrønt samstarv ..... | 0 | 90,0 | 90,0 |
| | Nordisk samarbeide | | | |
| | | 6.487 | 1.297,0 | 7.784,0 |
| **§ 11** | **Landsfyrisitingin**<br>**Landsadministrationen** | | | |
| 1001 | Løgmaður og landstýri..... | 1.365 | ÷ 21,7 | 1.343,3 |
| | Lagmand og landsstyre | | | |
| 1101 | Landsskrivstova ..... | 4.472 | 332,3 | 4.804,3 |
| | Landskontor | | | |
| 1110 | Fiskivinnustova ..... | 601 | ÷ 8,6 | 592,4 |
| | Fiskerikontor | | | |
| 1120 | Uttanríkistænasta í Aberdeen | 331 | 36,0 | 367,0 |
| | Udenrigstjeneste i Aberdeen | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1125 | Uttanríkistænasta í København<br>Udenrigstjeneste i København | 417 | 27,4 | 444,4 |
| 1150 | Líkningarráð .....<br>Ligningsråd | 2.611 | 96,3 | 2.707,3 |
| 1160 | Manntalsstova .....<br>Folkeregister | 457 | 5,0 | 462,0 |
| 1170 | Almannastova .....<br>Socialforvaltning | 2.667 | 256,6 | 2.923,6 |
| 1180 | Landsskúlafyrisiting .....<br>Landsskoleadministration | 4.533 | ÷837,9 | 3.695,1 |
| 1201 | Gjaldstova.....<br>Oppebørselskontor | 7.965 | 4.834,8 | 12.799,8 |
| 1210 | Gjaldstovudeild í Klaksvík ..<br>Oppebørsfilial i Klaksvig | 554 | 44,3 | 598,3 |
| 1215 | Gjaldstovudeild í Saltangará<br>Oppebørselsfilial i Saltangará | 429 | 2,6 | 431,6 |
| 1220 | Gjaldstovudeild í Fuglafirði .<br>Oppebørselsfilial i Fuglafirði | 256 | 19,9 | 275,9 |
| 1225 | Gjaldstovudeild á Tvøroyri .<br>Oppebørselsfilial i Tvøroyri | 408 | ÷4,0 | 404,0 |
| 1230 | Gjaldstovudeild í Vági .....<br>Oppbørselsfilial i Vági | 295 | 66,9 | 361,9 |
| 1231 | Gjaldstovudeild í Sørvági ...<br>Oppebørselsfilial i Sørvági | 295 | ÷9,5 | 285.5 |
| 1239 | Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald .....<br>Kontorgodtgørelse til syslerne | 20 | ÷13,3 | 6,7 |
| 1240 | Tolleftirlit .....<br>Toldvæsen | 2.228 | 146,9 | 2.374,9 |
| 1250 | Valuta- og prísráð .....<br>Valuta- og prisråd | 699 | ÷64,5 | 634,5 |
| 1260 | Lønarráð .....<br>Lønningsråd | 6 | ÷2,3 | 3,7 |
| 1270 | Búskaparráð .....<br>Økonomisk råd | 1.470 | ÷129,2 | 1.340,8 |
| 1280 | Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands .....<br>Rejse- og dagpenge inden- og udenlands | 1.250 | 878,0 | 2.128,0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1290 | Innheintingarútreiðslur ..... | 30 | 5,3 | 35,3 |
| | **Udgifter til inkasso** | | | |
| 1295 | Ognin Tinganes ..... | 906 | 198,3 | 1.104,3 |
| | Ejendommen Tinganes | | | |
| 1301 | Landsverkfrøðingsskrivstovan ..... | 5.789 | 840,6 | 6.629,6 |
| | Landsingeniørkontor | | | |
| | | 40.054 | 6.700,2 | 46.754,2 |
| **§ 12** | **Heilsumál** | | | |
| | **Sundhedsvæsen** | | | |
| 2010 | Landssjúkrahúsið (D.A.H.) . | 41.734 | 3.574,7 | 45.308,7 |
| | Landssygehuset (D.A.H.) | | | |
| 2020 | Klaksvíkar Sjúkrahús ..... | 10.327 | 692,3 | 11.019,3 |
| | Klaksvík Sygehus | | | |
| 2030 | Suðuroyar Sjúkrahús ..... | 5.160 | 479,5 | 5.639,5 |
| | Suðuroyar Sygehus | | | |
| 2040 | Heilsumiðstøðir, í grunn .... | 1.000 | 0 | 1.000,0 |
| | Sundhedscenter, henl. i fond | | | |
| 2050 | Læknar ..... | 395 | 12,1 | 407,1 |
| | Læger | | | |
| 2060 | Ljósmøður ..... | 385 | 87,0 | 472,0 |
| | Jordemødre | | | |
| 2065 | Heimasjúkrasystraskipan ... | 665 | ÷ 279,8 | 385,2 |
| | Hjemmesygeplejeordning | | | |
| 2090 | Ymiskar útreiðslur ..... | 444 | ÷ 39,3 | 404,7 |
| | Diverse udgifter | | | |
| | | 60.110 | 4.526,5 | 64.636,5 |
| **§ 13** | **Samferðslumál** | | | |
| | **Kommunikationsvæsen** | | | |
| 3900 | Nýggir vegir og brýr, breiðav brúm og umsiting av vegum (viðm.) ..... | 32.000 | 20.014,4 | 52.014,4 |
| | Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje (anm.) | | | |
| 3902 | Havnagerð, í grunn ..... | 25.000 | 0,0 | 25.000,0 |
| | Havnebygning, henl. i fond | | | |
| 3903 | Lendingar, í grunn ..... | 17.500 | 0,0 | 17.500,0 |
| | Landingspladser, henl. i fond | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3904 | Flogferðsla, í grunn ..... | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| | Flyvetrafik, henl. i fond | | | |
| 3906 | Berghols- og brúgvagerð, í grunn ..... | 4.000 | 0,0 | 4.000,0 |
| | Tunnel- og brobygning, henl. i fond | | | |
| 3907 | Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn ..... | 3.500 | 0,0 | 3.500,0 |
| | Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond | | | |
| 3908 | Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins ..... | 0 | 5.765,1 | 5.765,1 |
| | Postvæsenets bygge- og driftsfond | | | |
| | | 83.000 | 25.779,5 | 108.779,5 |
| **§ 14** | **Skúlamál** | | | |
| | **Undervisningsvæsen** | | | |
| 2205 | Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið ..... | 300 | ÷ 183,4 | 116,6 |
| | Fællesudgifter for skolevæsenet | | | |
| 2210 | Fólkaskúlin ..... | 36.275 | 4.032,5 | 40.307,5 |
| | Folkeskolen | | | |
| 2215 | HF-skeið í Suðuroy ..... | 1.998 | 380,8 | 2.378,8 |
| | HF-kursus i Suðuroy | | | |
| 2216 | HF-skeið í Klaksvík og Gøtu . | 2.216 | 941,4 | 3.157,4 |
| | HF-kursus i Klaksvík og Gøta | | | |
| 2220 | Studentaskúlin ..... | 10.884 | 561,1 | 11.445,1 |
| | Gymnasium | | | |
| 2225 | Kostdeild Studentaskúlans .. | 1.287 | 794,5 | 2.081,5 |
| | Studenterskolens kostafdeling | | | |
| 2230 | Føroya Sjómansskúli ..... | 3.245 | ÷ 24,8 | 3.220,2 |
| | Færøernes Navigationsskole | | | |
| 2240 | Klaksvíkar Sjómansskúli ... | 1.390 | ÷ 606,3 | 783,7 |
| | Klaksvík Navigationsskole | | | |
| 2250 | Føroya Fólkaháskúli ..... | 1.340 | 5,5 | 1.345,5 |
| | Færøernes Folkehøjskole | | | |
| 2255 | Húshaldsskúlar ..... | 328 | 23,0 | 351,0 |
| | Husholdningsskoler | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2260 | Kvøldskúlar ..... | 1.072 | 429,1 | 1.501,1 |
| | Aftenskoler | | | |
| 2290 | Ítrótt | | | |
| | Idræt | | | |
| | 3110 Lánsgrunnur til ítróttar-anlegg. . | 100 | 0,0 | 100,0 |
| | Lånefond til idrætsanlæg | | | |
| | 3112 Studningur til Í.S.F.(viðm.). | 850 | 0,0 | 850,0 |
| | Tilskud til Í.S.F. (anm.) | | | |
| | 3113 Studningur til ferðir innanoyggja ..... | 300 | 333,0 | 633,0 |
| | Tilskud til indenlands rejser | | | |
| 2295 | Ymiskur studningur ..... | 2.640 | ÷70,4 | 2.569,6 |
| | Diverse tilskud | | | |
| | | 64.225 | 6.616,0 | 70.841,0 |
| § 15 | **Vísindi, bókmentir og list ..** | | | |
| | **Videnskab, litteratur og kunst** | | | |
| 2310 | Landsbókasavn ..... | 1.853 | ÷115,6 | 1.737,4 |
| | Landsbibliotek | | | |
| 2320 | Fólkabókasøvn ..... | 2.252 | ÷106,6 | 2.145,4 |
| | Folkebiblioteker | | | |
| 2330 | Landsskjalasavn ..... | 766 | 42,8 | 808,8 |
| | Landsarkiv | | | |
| 2340 | Føroya Fornminnissavn .... | 2.324 | ÷64,4 | 2.259,6 |
| | Færøernes Museum | | | |
| 2350 | Bygdasøvn ..... | 135 | ÷25,1 | 109,9 |
| | Bygdemuseer | | | |
| 2355 | Fiskirannsóknarstovan ..... | 4.500 | 1.054,5 | 5.554,5 |
| | Fiskeribiologisk laboratorium | | | |
| 2365 | Fuglakanningarstøð v.m. ... | 18 | 50,2 | 68,2 |
| | Ornitologisk station m.v. | | | |
| 2370 | Náttúrugripasavn ..... | 862 | 127,7 | 989,7 |
| | Naturhistorisk samling | | | |
| 2371 | DGU ..... | 290 | ÷45,5 | 244,5 |
| 2372 | Jarðfrøðiligar boringar .... | 0 | 9.333,5 | 9.333,5 |
| 2375 | Fróðskaparsetur Føroya .... | 3.555 | 89,8 | 3.644,8 |
| | Færøernes Akademi | | | |
| 2379 | Stovnar á Debessartrøð ..... | 822 | 14,1 | 836,1 |
| | Institutioner på Debessartrøð | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2380 | Heilsufrøðilig Starvstova ...<br>Hygiejnisk laboratorium | 1.182 | 135,8 | 1.317,8 |
| 2385 | Náttúrufriðingarnevndir ....<br>Naturfredningsudvalg | 80 | 68,7 | 148,7 |
| 2389 | Sangur og tónleikur .....<br>Sang og musik | 300 | 36,2 | 336,2 |
| 2390 | Ymiskir studningar .....<br>Diverse tilskud | 3.158 | 309,0 | 3.467,0 |
| | | 22.097 | 10.905,1 | 33.002,1 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 16** | **Fiskivinna, sigling o.t.**<br>**Fiskeri, søfart o.l.** | | | |
| 2401 | Vrakarastovnur .....<br>Vragerinstitution | 1.311 | 214,0 | 1.525,0 |
| 2410 | Nautiskt Royndarkamar ....<br>Nautisk prøvekammer | 16 | ÷ 5,8 | 10,2 |
| 2420 | Sjómansheim (viðm.) .....<br>Sømandshjem (anm.) | 140 | 0,0 | 140,0 |
| 2430 | Vaktar- og bjargingarskip ...<br>Vagt- og bjærgningsskib | | | |
| 2431 | Vaktarskipið Tjaldur .....<br>Vagtskibet Tjaldur | 12.499 | ÷ 58,6 | 12.440,4 |
| 2433 | Vaktarskipið Ólavur Halgi ..<br>Vagtskibet Ólavur Halgi | | | |
| 2440 | Laksa- og sílaaling .....<br>Lakse- og ørreddrift | 600 | 548,4 | 1.148,4 |
| 2450 | Prísásetingarnevndin fyri salt- og ráfisk .....<br>Prisudvalget for salt- og råfisk | 100 | 39,0 | 139.0 |
| 2460 | Fiskivinnuráðið .....<br>Fiskerirådet | 192 | ÷ 60,5 | 131,5 |
| 2490 | Aðrir studningar<br>Andre tilskud | | | |
| 3301 | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna .<br>Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet | 206.000 | ÷1.490,6 | 204.509,4 |
| 3302 | Studningur til grunnin til endurnýggjan av skipaflotanum ..... | 12.000 | 0,0 | 12.000,0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Tilskud til fonden til fiskerflådens fornyelse | | | |
| 3303 | Grindir ..... Grindefangst | 5 | 82,3 | 87,3 |
| 3306 | Havrannsóknarskip, í grunn ..... Havundersøgelsesskib, henl. i fond | 400 | 0,0 | 400,0 |
| 3307 | Praktiskar fiskiroyndir Praktiske fiskeriforsøg | 2.500 | 139,9 | 2.639,9 |
| 3308 | Vaktarskip í grunn ... Vagtskib, henl. i fond | 100 | 0,0 | 100,0 |
| 3309 | Útróðrarstøðir í grunn . Hjemmefiskeristationer | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| 3310 | Trygdargrunnur veiðimanna ..... Fiskernes garantifond | 200 | ÷ 200.0 | 0,0 |
| | Viðvíkjandi serlánum . | 0 | 13,8 | 13,8 |
| 3730 | Landsstýrinum at ráða yvir ..... Landsstyret at råde over | 100 | 274,1 | 374,1 |
| | | 237.163 | ÷504,0 | 236.659,0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| § 17 | **Landbúnaður og matrikulering** **Laudbrug og matrikulering** | | | |
| 2501 | Landsdjóralæknaembætið .. Landsdyrelægeembedet | 482 | 15,5 | 497,5 |
| 2504 | Landbúnaðarráðgevari ..... Landbrugskonsulent | 207 | 3,4 | 210,4 |
| 2505 | Seyðaráðgevari og seyðaroyndir Fåreavlskonsulent og fåreavlsforsøg | 115 | 9,2 | 124,2 |
| 2510 | Útskifting og matrikulstova .. Udskiftning og matrikelkontor | 3.275 | 150,0 | 3.425,0 |
| 2520 | Royndarstøðin í Hoyvík .... Forsøgsstationen i Hoyvík | 1.063 | 79,6 | 1.142,6 |
| 2590 | Aðrir studningar ..... Andre tilskud | 12.150 | ÷219,6 | 11.930,4 |
| | | 17.292 | 38,1 | 17.330,1 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 18** | **Handil, íðnaður o.t.**<br>**Handel, industri m.v.** | | | |
| 2710 | Arbeiðseftirlit .....<br>Arbejdstilsyn | 826 | ÷ 29,9 | 796,1 |
| 2715 | Brandvenjingarstøðin við Áir | 0 | 227,5 | 227,5 |
| 2720 | Bileftirlit .....<br>Biltilsyn | 553 | 11,0 | 564,0 |
| 2723 | Ráðið fyri ferðslutrygd .....<br>Rådet for færdselssikkerhed | 200 | 0,0 | 200,0 |
| 2726 | Filmseftirlit .....<br>Filmstilsyn | 150 | ÷ 1,6 | 148,4 |
| 2730 | Skipaskrá og uppmáting ....<br>Skibsregister og opmåling | 15 | 64,7 | 79,7 |
| 2731 | Semingsmannaskipanin ....<br>Forligsinstitutionen | 35 | 50,8 | 85,8 |
| 2732 | Kolagrevstur .....<br>Kulbrydning | 400 | 531,5 | 931,5 |
| 2733 | Læruráðið .....<br>Lærerådet | 271 | ÷ 90,1 | 180,9 |
| 2734 | Skeiðvirksemi .....<br>Kursusvirksomhed | 115 | 18,8 | 133,8 |
| 2790 | Aðrir studningar<br>Diverse tilskud | | | |
| | 3501 Føroya Ferðamannafelag<br>Færøernes Turistforening | 150 | 0,0 | 150,0 |
| | 3502 Stuðul til íðnaðarfremjandi endamál .....<br>Støtte til industrifremmende formål | 2.250 | ÷ 734,9 | 1.515,1 |
| | 3503 At leggja í Gistingarhúsgrunn .....<br>Henlæggelse i hotelfonden | 600 | 0,0 | 600,0 |
| | 3504 Til menningargrunn ..<br>Til udviklingsfond | 4.500 | 3.500,0 | 8.000,0 |
| | 3506 Studningur til meistarar<br>Tilskud til mestere | 2.000 | ÷ 690,9 | 1.309,1 |
| | 3730 Landsstýrinum at ráða yvir .....<br>Landsstyret at råde over | 75 | 35,5 | 110,5 |
| | | 12.140 | 2.892,4 | 15.032,4 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| § 19 | **Almeun forsorg v.m.**<br>**Sosialvæsen m.v.** | | | |
| 2805 | Fólkapensjón .....<br>Folkepension | 47.835 | 4.489,8 | 52.324,8 |
| 2810 | Avlamispensión .....<br>Invalidepension | 18.230 | 2.132,7 | 20.362,7 |
| 2820 | Barnastyrkur til stakar upphaldarar<br>Børnebidrag til enlige forsørgere | 1.000 | 384,0 | 1.384,0 |
| 2830 | Enkjupensjon .....<br>Enkepension | 2.560 | ÷ 249,7 | 2.310,3 |
| 2840 | Vanlig forsorg .. ..<br>Almindelig forsorg | 1.565 | ÷ 175,9 | 1.389,1 |
| 2845 | Víðkað hjálp .....<br>Udvidet hjælp | 580 | 655,2 | 1.235,2 |
| 2850 | Einkjuhjálp .....<br>Enkehjælp | 1.865 | 831,5 | 2.696,5 |
| 2855 | Barnaforsorg .....<br>Børneforsorg | 2.520 | 886,3 | 3.406,3 |
| 2860 | Umsiting av heimahjálparaskipanini .....<br>Administration af hjemmehjælpsordn. | 10.000 | 1.552,3 | 11.552,3 |
| 2865 | Dagpeningaskipanin .....<br>Dagpengeordningen | 6.400 | 2.456,8 | 8.856,8 |
| 2866 | Fritíðarheimið í Skrivaragøtu<br>Fritidshjemmet i Skrivaragøtu | 0 | 534,9 | 534,9 |
| 2870 | Heimasjúkrasystraskipanin .<br>Hjemmesygeplejerskeordningen | 0 | 0 | 0 |
| 2875 | Brennistudningur til pensionistar .....<br>Brændselstilskud til pensionister | 0 | 3.596,1 | 3.596,1 |
| 2890 | Ymisir studningar .....<br>Forskellige tilskud | 18.008 | 244,0 | 18.252,0 |
| | | 110.563 | 17.338,0 | 127.901,0 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 20** | **Pensjónsútreiðslur**<br>**Pensionsudgifter** | | | | |
| 2901 | Pensjónsútreiðslur<br>pensionsudgifter | | | | |
| | 1060 | Eftirlønir ..... | 500 | 120,3 | 620,3 |
| | | Pensioner | | | |
| | 1061 | Biðipeningur..... | 1.000 | 378,6 | 1.378,6 |
| | | Ventepenge | | | |
| | 1062 | Tænastumannaeftirlønir | 1.319 | 68,8 | 1.387,8 |
| | | Tjenestemandspensioner | | | |
| | | | 2.819 | 567,7 | 3.386,7 |
| **§ 21** | **Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn**<br>**Effektive garantiforpligtelser, i fond** | | | | |
| 2902 | Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn ..... | | 6.000 | 0,0 | 6.000 |
| | Effektive garantiforpligtelser, i fond | | | | |
| | | | 6.000 | 0,0 | 6.000 |
| **§ 22** | **Aðrar og óvissar útreiðslur**<br>**Andre og uvisse udgifter** | | | | |
| 2910 | Aðrar og óvissar útreiðslur<br>Andre og uvisse udgifter | | | | |
| | 2050 | Umboðan ..... | 300 | 222,9 | 522,9 |
| | | Repræsentation | | | |
| | 2570 | Útreiðslur av vali ..... | 50 | 33,7 | 83,7 |
| | | Udgifter vedrørende valg | | | |
| | 2575 | Dóms- og løgreglumál . | 20 | + 15,2 | 4,8 |
| | | Retsvæsen og politi | | | |
| | 2580 | Studningur til politiskt upplýsingararbeiði v.m. | 740 | 0,0 | 740,0 |
| | | Tilskud til politisk oplysningsarbeide m.m. | | | |
| 3730 | Landsstýrinum at ráða yvir | | 350 | 130,4 | 480,4 |
| | Landsstyret at råde over | | | | |
| | | | 1.460 | 371,8 | 1.831,8 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 23** | **At leggja í ymsar grunnar v.m.**<br>**Henlægges til forskellige fonds m.m** | | | |
| 3801 | Avlopið hjá apotekinum lagt í apotekgrunnin .....<br>Apotekets overskud henlagt til apotekfonden | 126 | 242,7 | 368,7 |
| 3805 | Avlopið hjá telefonverkinum .<br>Telefonværkets overskud | 1.442 | ÷ 6.142,4 | ÷ 4.700,4 |
| 3806 | Avlop hjá Postverki Føroya<br>Postvæsenets overskud | ÷ 2.562 | ÷ 3.203,1 | ÷ 5.765,1 |
| 3810 | Avlopið hjá útvarpinum ....<br>Radiofoniens overskud | 461 | 15,6 | 476,6 |
| 3815 | Til kirkjugrunnin .....<br>Til kirkefonden | 1.825 | 0,0 | 1.825,0 |
| | | 1.292 | ÷ 9.087,2 | ÷ 7.795,2 |
| **§ 24** | **Burturleggingar til avdráttir av lánum**<br>**Henlæggelser til afdrag på lån** | | | |
| 2930 | Burturleggingar til avdráttir av lánum .....<br>Hennlæggelser til afdrag på lån | 0 | 0,0 | 0,0 |
| | | 0 | 0,0 | 0,0 |
| **§ 25** | **Avskrivingar**<br>**Afskrivninger** | | | |
| 2490 | Avskrivingar<br>Afskrivninger | 36.857 | 11.400,3 | 48.257,3 |
| | | 36.857 | 11.400,3 | 48.257,3 |
| **§ 26** | **Ymsar ognarútreiðslur**<br>**Diverse ejendomsudgifter** | | | |
| 2950 | Ymsar ognarútreiðslur (kt. 1330 § 11) .....<br>Diverse ejendomsudgifter | 150 | ÷ 64,8 | 85,2 |
| | Samanlagdar útreiðslur .....<br>Udgifter ialt | 701.709 | 78.776,6 | 780.485,6 |
| | Munur<br>Difference | + 749 | 12.817,1 | 13.566,1 |
| | | 702.458 | 91.593,7 | 794.051,7 |

**Útreiðslurnar undir teimum einstøku útreiðslugreinunum hava verið fylgjandi:**

| | | Játtan (1.000 kr.) | Meirútreiðslur (1.000 kr.) | Útreiðslur tilsamans (1.000 kr.) |
|---|---|---|---|---|
| § 10 | Løgtingið | 6.487 | 1.297,0 | 7.784,0 |
| § 11 | Landsumsitingin | 40.054 | 6.700,2 | 46.754,2 |
| § 12 | Heilsumál | 60.110 | 4.526,5 | 64.636,5 |
| § 13 | Samferðslumál | 83.000 | 25.779,5 | 108.779,5 |
| § 14 | Skúlamál | 64.225 | 6.616,0 | 70.841,0 |
| § 15 | Vísindi, bókmentir og list | 22.097 | 10.905,1 | 33.002,1 |
| § 16 | Fiskivinna, sigling o.t. | 237.163 | ÷ 504,0 | 236.659,0 |
| § 17 | Landbúnaður og matrikulering | 17.292 | 38,1 | 17.330,1 |
| § 18 | Handil, ídnaður o.t. | 12.140 | 2.892,4 | 15.032,4 |
| § 19 | Almenn forsorg v.m. | 110.563 | 17.338,0 | 127.901,0 |
| § 20 | Pensjónsútreiðslur | 2.819 | 567,7 | 3.386,7 |
| § 21 | Effektivar veðhaldsbindingar í grunn | 6.000 | 0,0 | 6.000,0 |
| § 22 | Aðrar óvissar útreiðslur | 1.460 | 371,8 | 1.831,8 |
| § 23 | At leggja í ymsar grunnar v.m. | 1.292 | ÷ 9.087,2 | ÷ 7.795,2 |
| § 24 | Burturleggingar til avdráttir av lánum | 0 | 0,0 | 0,0 |
| § 25 | Avskrivingar | 36.857 | 11.400,3 | 48.257,3 |
| § 26 | Ymsar ognarútreiðslur | 150 | ÷ 64,8 | 85,2 |
| | | 701.709 | 78.776,6 | 780.485,6 |

Minnilutin (Atli P. Dam) vísir á, at fyriliggjandi eykafíggjarlóg eins og mangar aðrar lýsingar av peninganýtsluni hjá sitandi samgongu sýnir, at landsstýrið als ikki hevur tamarhald á fíggjarligu viðurskiftum okkara.

Sýnir at landsstýrið við órætti gav sær sjálvum navnið sparilandsstýrið og soleiðis hevur latið seg í búna, tað ikki sjálvt eigur. Øll tey bragdligu orð um tamarhald á almenna peningabrúkinum, um avtøku av eykafíggjarlógum, um tálming av ójáttaðum yvirforbrúki hjá stovnum, sum sparing í ferðing og sparing á umboðanarkonto o.s.fr., eru deyð og virðileys, og so er hetta bert byrjanin hjá sitandi samgongu.

Gongdin síðan við fíggjarlógini 1982/83 og 1983/84 hevur uppaftur

grefligari sýnt, at ongantíð fyrr hevur í føroyskari politiskari søgu verið so lítið samsvar millum orð og gerðir, ímillum reyp og veruleika.

Vit vita nú, at eftir knappliga trimum árum hevur tað stýri, sum segði seg skula rætta hallandi skútuna upp aftur, sum skuldi skerja almenna brúkið og minka um almennu samferðsluíløgurnar, økt peninganýtslu sína við 500 mill. kr.

Í neyð síni av at uppfylla lyftini um at gera eykafíggjarlógir óneyðugar hevur landsstýrið verið noytt at »yvirbudgettera« út um alt mark og tað, sum verri er, til at rinda hetta hava teir valt at pína hin minni menta og vanliga løntakaran nærum til avlívis.

Seinasta bragdið er sum kunnugt skattastuldurin, sum teir legaliseraðu í eini kunngerð, sum tekur eina mánaðarløn og nakað aftrat frá hvørjum skattgjaldara, eina góða mánaðarløn sum skattgjaldarin ongantíð fekk, men sum hann skuldi havt vunnið fyri at orka at gjalda tað hálva gjaldið, sum samgongan nú tekur í forhond.

Eykafíggjarlógin er byrjanin til avdúkingina av tí »forlorna«, sum eyðkennir samgonguna í odd og egg.

Hóast inntøkurnar eru 110-120 mill. kr. hægri enn ásett í sjálvari fíggjarlógini, er meirnýtslan nærum hin sama, so avlopið er kortini bert 13 mill. kr.

Har tað serliga hevur svikið, kann nevnast:

1. Nýtslan á Strandferðslukontini bleiv 14 mill. kr. hægri, tí samgongan í treiskni ikki vildi seta játtanina hægri enn 16 mill. kr.
2. Ikki heimilar meirnýtslu á § 13 er 20 mill. kr., hóast løgmaður proklameraði, at slíkt skuldi ongantíð henda aftur.
3. Til ferða- og dagpening vóru nýttar 2,2 mill. kr. ella umleið 900.000 kr. ov nógv, hóast løgmaður segði, at hetta kundi greiðast við nøkrum frímerkjum.
4. Til umboðan vóru nýttar 520.000 kr. í staðin fyri 260.000, hóast landsstýrið við farisearalótum avtók løgmansveitslu fyri at geva sær sjálvum mynd sum stýrið, ið spardi uppá mat og drekka á almennum veitslum og spardi uppá talið av slíkum veitslum.

   Kortini megnaði stýrið at nýta kr. 200.000 meira enn undanfarna stýrið á hesi konto.

   »Fals slær ofta egnan harra á háls« søgdu teir gomlu, og varð her avdúkaður ein dupultmoralur, sum sera væl svarar við alt dupultspæl, sum rikið verður av hesi samgongu í allari peninganýtslu.
5. Eitt generelt yvirforbrúk á allari lógini, sum ikki er minkað á eftirfylgjandi lógum.

Tá hartil kemur, at fíggjarmálaráðharri okkara hevur sýnt, at hann hevur ilt við at gjøgnumskoða tað spælið, sum serliga leiðari landsstýrisins rekur við allari samfelagsorkuni hjá okkum, so átti avleiðingin at verið, at fyrst hann og síðani landsstýrið alt ásannaði, at stýringin av okkara fíggjarviðurskiftum er so út av lagi — sum uttanlandsskuldin sýnir — at teir mugu leggja frá sær sum skjótast.

Hóast hesa niðurstøðu, so væntar minnilutin ikki, at samgongan fylgir hesum tilmæli. Kortini skal skilaloysið og tann ovurnýtsla, sum er hend, á ein ella annan hátt legaliserast.

Javnaðarflokkurin, sum altíð hevur kent ábyrgd fyri okkara fíggjarlóg, noyðist tí kortini at atkvøða fyri hesi eykafíggjarlóg.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) setur fram hesar viðmerkingar: At eykafíggjarlógin týðiliga vísir landsstýrisins tørvandi evni til at gera eina umleið haldgóða metan av bæði inntøkum og útreiðslum til eina fíggjarlóg. Landsstýrið reypaði jú av, at eingin eykafíggjarlóg skuldi koma, men her er so eykarokningin uppá góðar 78 milj. kr., hóast tað at inntøkurnar vóru 97 milj. kr. hægri, enn mett var av landsstýrinum á fíggjarlógini. Hvat alt vísir landsstýrisins tørvandi evni til at stýra landsins fíggjarligu viðurskiftum. So statt setir minnilutin einki uppskot fram.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) metir tann fíggjarpolitikk, sum landsstýrið hevur sett í staðin fyri eykafíggjarlógina, nevniliga at innbyggja væntaðar hækkingar í sjálva fíggjarlógina, at verða dýrtíðarfremjandi.

Minnilutin setur tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið harmast, at landsstýrið førir ein dýrtíðarfremjandi fíggjarpolitikk og heitir á landsstýrið um aftur at nýta eykafíggjarlógir.

Føroya landsstýri, 8. mars 1983 1500-5-3

Jarðfrøðiligu boringarnar, sum eru farnar fram í Vestmanna og í Suðuroy í fíggjarárinum 1980/81, 1981/82 og 1982/83, kunnu gerast upp soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1980/81 | kr. | 795.300,00 |
| 1981/82 | — | 10.333.475,48 |
| 1982/83 | — | 39.600,00 |
| | kr. | 11.168.375,48 |

| | | |
|---|---|---|
| Studningur úr »Carlsbergfonden« goldin í 1981/82 | kr. | 1.000.000,00 |
| | kr. | 10.168.375,48 |

Útreiðslurnar fyri 1980/81 eru tiknar við á eykafíggjarlógina fyri hetta árið, meðan útreiðslurnar fyri 1981/82 uppá kr. 10.333.475,48 ikki eru tiknar við á eykafíggjarlógina fyri 1981/82 við tí grundgeving, at ætlan landsstýrisins var, at hesar útreiðslur skuldu rindast úr orkugrunninum.

Men formelt er hetta ikki fingið í rættlag. Í §2 í løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn frá 7. juni 1979 stendur, at eru landsstýrið og orkuráðið samd um, at ávísar metingar, kanningar ella royndir eiga at verða framdar, verða útreiðslurnar, ið standast av hesum tiltøkum, goldnar úr orkugrunninum.

Tað er henda semja millum Føroya Landsstýri og orkuráðið, sum ikki er fingin í lag.

Í løtuni er støðan tann, at útreiðslurnar fyri jarðfrøðiligu boringarnar eru bókaðar á landskassaroknskapin fyri 1981/82, sum er farin til prentingar.

Landsstýrið hevur á fundi 4. mars í ár samtykt at heita á tíggjarnevndina um at taka omanfyri nevndu kr. 10.333.475 ÷ 1 mió. kr., sum »Carlsbergfonden« hevur goldið í 1981/82, t.v.s. kr. 9.333.475,48, við á eykafíggjarlógina 1981/82.

Pauli Ellefsen
løgmaður

Fíggjarnevndin her, /J. Djurhuus

2. viðgerð 18. mai. Uppskot frá nevndini §1 samtykt við 24-0, §§ 2-8 samtyktar við 23-0, §§10-21 samtykt við 25-0, §22 samtykt við 20-1.

§§ 23-26 samtyktar við 26-0. Uppskot til samtyktar frá Adolf Hansen fall við 12-0.

3. viðgerð 18. mai. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 400-32 Lóg nr. 75, 25. juli 1983

---

# 7. Framleinging av løgtingslóg um vinningssteðg

Ár 1982, týsdagin 7. september legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um framleinging av løgtingslóg um vinningssteðg**

**§1.** Løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 6. mai 1982, verður framlongd við teirri broyting, at í §5 verður »31. august 1982« broytt til »31. august 1983«.

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinavegin.

**lagtingslov om forlængelse af lagtingslov om avancestop**

**§1.** Lagtingslov nr. 54 af 14. september 1981 om avancestop, som ændret ved lagtingslov nr. 51 af 6. maj 1982, forlænges med den ændring, at i § 5 ændres »31. august 1982« til 31. august 1983«.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Við løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 varð vinningssteðgur settur til 31. mars 1982 bæði í krónum og prosentum.

Við løgtingslóg nr. 51 frá 6. mai 1982 varð lógin framlongd, tó soleiðis at vinningssteðgur í krónum varð avtikin.

Meðan lógin um vinningssteðg hevur verið í gildi, er prístalið hækkað frá 130,8 til 138,3 = 7,5 stig ella 5,7%.

Landsstýrið hevur samtykt at skjóta upp, at lógin verður framlongd eitt ár, tá tað ikki er óhugsandi, at lógin hevur havt eina ávirkan á tann lága prístalsvøksturin seinasta árið.

1. viðgerð 9. september. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. í s.m. legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 7. september 1982 og undir 1. viðgerð 9. september 1982 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 15. september 1982 viðgjørt málið.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Annfinn Kallsberg og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins um bert at seta í verk vinningssteðg, tí mett verður, at lógin ikki hevur virkað nóg væl.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) setir tí fram niðanfyri standandi uppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins:

**Uppskot**
**til**

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um prís- og vinningssteðg.** | **lagtingslov om pris- og avancestop.** |
| **§ 1.** Ásettur verður prís- og vinningssteðgur fyri allar vørur í tíðarskeiðinum 20. september 1982 til 1. august 1983. | **§ 1.** Pris- og avancestop træder i kraft for alle varer i perioden 20. september 1982 indtil 1. august 1983. |

**§2.** Í hesum tíðarskeiði kunnu prishækkanir ikki fara fram við undantak av teimum hækkingum, ið standast av gjøldum til tað almenna, men má vinningur ikki roknast av hesum.

**§3.** Tó kann Prísráð Føroya eftir umsókn geva loyvi til prishækkingar, tá fullgott prógv er fyri, at so má vera.

**§4.** Í reglugerð, sum skal góðkennast av fíggjarnevnd Føroya løgtings, ásetir Føroya landsstýri nærri reglur fyri, hvussu henda lóg verður at umsita.

**§5.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**§ 2.** I dette tidsrum kan der ikke foretages prisforhøjelser med undtagelse af de forhøjelser, der er forårsaget af afgifter til det offentlige, men fortjeneste må ikke beregnes af disse.

**§3.** Dog kan Færøernes Prisråd efter ansøgning give tilladelse til prisforhøjelser, såfremt tilfredsstillende bevis føres, for at dette er nødvendigt.

**§4.** I reglement, der skal godkendes af lagtingets finansudvalg, fastsætter Færøernes landsstyre nærmere regler for, hvordan denne lov skal administreres.

**§5.** Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) viðmerkir, at tjóðveldisflokkurin metir ikki, at lógin um vinningssteðg hevur havt nakra ávirkan á prislagið. Flokkurin er av teirri áskoðan, at tað er neyðugt at herða lógina soleiðis, at vinningssteðgurin verður settur í gildi bæði í krónum og oyrum og harumframt prissteðg.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) setir tí fram niðanfyri standandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

**Broytingaruppskot**

Í §1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg verður »í%« broytt til »hvørki í kr. ella %«.

I §1, stk. 1 i lagtingslov nr. 54 af 14. september 1981 om avancestop ændres »i%« til »hverken absolut eller i %«.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 17. september. Atkvøðugreiðslan útsett til seinni fund sama dag. Uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 20-0 atkvøðum, §2 uttan atkvøðugreiðslu. Minnilutauppskotið frá Jørgen Thomsen fall við 14-0 og minnilutauppskot frá Ova Mikkelsen fall við 14-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1115-24 Lóg nr. 103, 7. oktober 1982.

---

# 8. Lántøka til røktarheimsbygging

Ár 1982, týsdagin 7. september legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um lántøku til røktarheimsgrunn v.m.**

§1. Landsstýrinum verður heimilað at taka upp til 30 mió. kr. í láni til ansingar- og røktarheimsgrunnin.

§2. Burtur av hesum peningi fáa

**lagtingslov om optagelse af lån til plejehjemsfonden m.v.**

§1. Landsstyret bemyndiges til at optage lån på op til 30 mio. kr. til opholds- og plejehjemsfonden.

§2. Af dette beløb får Tórs-

Tórshavnar kommuna o.a. játtað til bygging av røktarheimi í Tórshavn.

havnar kommuna o.a. bevilling til bygning af plejehjem i Tórshavn.

§3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Tað hevur leingi verið greitt fyri almenninginum, at stórur tørvur er á røktarheimsplássum í Tórshavn.

Frá nógvum síðum, myndugleikum, starvsfólkum, læknum, lokalpolitikkarum og ikki minst avvarðandi, hevur leingi verið víst á, at støðan hjá røktarheimssjúklingum og teirra avvarðandi í Havn og í Suðurstreymoy sum heild er vorðin heilt ótolandi.

Tað er ikki neyðugt at føra fram nakað prógv fyri hesum viðurskiftum. Tað er nóg mikið at vísa til blaðskriviugina í summar og til umstøðurnar á verandi røktardeild á landssjúkrahúsinum. Sum kunnugt fyriliggur ein samtykt raðfylgja fyri røktarheimsbygging frá 1973. Eftir hesi raðfylgju verður valla farið undir røktarheimsbygging fyrr enn um leið 1990. Hetta kemur av, at tey bæði røktarheimini, sum eru í gerð, verða at troyta alla fíggjarorku hjá fólkapensjónargrunni og røktarheimsgrunni nógv ár frameftir. Henda støða var longu greið fyri teimum, sum sótu við ábyrgdini av almannamálum í tí landsstýri, sum var undan liesum. Soleiðis hevði t.d. landsstýrismaðurin Vilhelm Johannesen samráðingar við umboð fyri Tórshavnar býráð um røktarheimsumstøðurnar í 1980.

Undir hesum samráðingum samdust umboðini fyri landsstýrið og býráðið um, at ein serloysn átti at verða funnin fyri Havnina, soleiðis at tað ikki fór at vera neyðugt at bíða eftir tí upprunaligu raðfylgjuni fyri røktarheimsbyggingum.

Men so kom samgonguslit, og henda roynd datt niðurfyri. Javnaðarflokkurin kennir seg framvegis bundnan av lyftinum til Havnar kommunu um at finna eina serskipan fyri røktarheimsbygging í Havn og mælir tí til at loysa fíggingarspurningin við lántøku. Á henda hátt slepst undan tí »fløskuhálsi«, sum er íkomin av byggingini í Eysturoy og í Klaksvík.

Við lántøku kunnu grunnarnir til hetta endamál verða førir fyri at fíggja røktarheimsbygging í Havn her og nú, og so kann tann pening-

ur, sum í framtíðini verður tilskrivaður grunnunum, heilt ella partvist fíggja rentur og avdrátt.

Fyrimunirnir við hesari skipan eru upplagdir:

Við at byggja nú byggja vit bíliga, vit sleppa undan 5-10 ára prishækkingum, og vit fáa nøktað tann ovurstóra tørviu, ið veruliga er á einum røktarheimi í Havn nú.

1. viðgerð 9. sept. Skotið varð upp at beina málið í fíggjarnevndina. Hetta fall við 9-0. Málið varð síðani beint í sosialu nevndina, sum 16. mai 1983 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 9. september 1982 beint í sosialu nevndina.

Orsøkin til, at málið er framlagt, er tann ovurstóri tørvur, sum er á røktarheimsplássum í Tórshavn og Suðurstreymoy í heila tikið. Harnæst, at røktarheimsbyggingin í Tórshavn í tíðarfestingini frá 1973 kemur so mikið seint, at eftir hemmi og fíggingarmøguleikunum verður hon ikki framd fyrr enn umleið 1990.

Sum støðan er í løtuni, rekur Tórshavnar kommuna eitt ellisheim, sum tó ikki nøktar tørvin á hesum øki, tí er eisini neyðugt við einum ellisheimi afturat. Hetta eigur tó ikki at verða tengt saman við røktarheimsspurningiuum.

Einasta røktarheim í Suðurstreymi er røktardeildin á Landssjúkrahúsinum. Tað er almannakunnugt, hvussu vánaligar umstøðurnar eru har, so tað er ikki neyðugt við umrøðu av hesum.

Uppskotið frá Javnaðarflokkinum snýr seg um at veita landsstýrinum eina lániheimild uppá 30 mió. kr. til ansingar- og røktarheimsgrunnin og burtur av hesum peningi at játta Tórshavnar kommunu eina upphædd til bygging av røktarheimi í Havn.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið og er komin til ta niðurstøðu, at bygging av nýggjum røktarheimi í Tórshavn fer at kosta væl meira enn 30 mió. kr., og soleiðis sum fíggjarvánirnar í løtuni eru, fer at verða torført at koma ígjøgnum við einum uppskoti um nýtt heim nú beinan vegin. Nevndin hevur tí eisini kannað aðrar møguleikar, sum skjótari kunnu hjálpa uppá tørvin, sum er.

Ein møguleiki, sum hevur ligið nær fyri at kanna, er at yvirtaka bygningarnar Eirargarður 14-16 til røktarheim. Ein slík loysn hevur sjálvandi ávísar fyritreytir. Tann fyrsta er, at tey, sum í løtuni búgva á hesum deildum undir andveikraverndini, fáa onnur tilboð bæði um búpláss og aðrar møguleikar til arbeiðis og ítriv.

Ein onnur fyritreyt er, at ásannað verður, at røktarheimsbygging og -rakstur er ein landsuppgáva, meðan ellisheimsbygging og -rakstur meira hoyrir undir ábyrgdina hjá kommunalu myndugleikunum.

Í løgtingsmáli nr. 72/1975: *Nýggj sjúkrahúslóg* gjørdi løgtingið í 1976 hesa samtykt um bústaðar- og trivnaðarmøguleikarnar hjá andsveikum.

»Harafturat áleggur løgtingið landsstýrinum at skipa fyri, at víðari útbygging fyri evnaveik — umframt frammanfyri nevndu bygging av 2 sjúklingabygningum fyri evnaveik á statssjúkrahúsinum — verður framd sum smærri vistar-, uppvenjingar- og avlastingarheim runt um í landinum, og beinan vegin taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar, fyri at henda útbygging kann verða framd skjótast gjørligt.«

Longu tá ið deildirnar á Eirargarði vórðu bygdar, meintu tey, ið varðaðu av teim evnaveiku, at tað ikki var rætt við so stórum stovnum á hospitalsøkinum til hesar medborgararnar, men heldur at fara undir útvegan av smærri eindum. Frá danskari síðu fekst einki annað tá, og umstøður annars vóru ikki at fara undir bygging av smáum stovnum í stórum tali, men løgtingið gjørdi sína samtykt við frammanfyri nevndu ætlanarfráboðan (hensigtserklæring).

Bæði tá og seinri hevur felagið Javni sett fram ynski um broyting í viðurskiftunum, og í álitinum frá »Ár teirra brekaðu« (síðu 255-278) er spurningurin viðgjørdur eins og í áliti frá nevnd, sum landsstýrið hevur sett at kanna málið.

Sosiala nevndin vil tí eisini mæla til, at beinan vegin verður farið undir at útvega smærri bústaðareindir til evnaveik, soleiðis at øll tey, sum ikki eru røktarsjúklingar, kunnu flyta frá Eirargarði 14-16. Fyritreytin er, at tey koma til nakað betur og annars koma at hava undirvísingar-, arbeiðs- og frítíðarmøguleikar. Heimini skulu byggjast (ella keypast) eftir tørvi. Støddin skal svara til eini 5-7 bústaðarpláss.

Ein úti flytan frá Eirargarði má gerast í samráð við eina nevnd av avvarðandi av búfólkunum og starvsfólkum á stovninum.

Ætlandi kann henda skipan koma so langt áleiðis uppá eini 2 ár (men sjálvandi eisini víðari útbyggjast), at tá kann Eirargarður 14-16 nýtast burturav til røktarsjúklingar. Um vit rokna við, at eini 8 av núverandi fólkunum á Eirargarði koma at halda fram sum røktarsjúklingar, so verður pláss fyri umleið 40 aftrat. Tað vil siga, at núverandi røktardeildin (barakkin) kann niðurleggjast innan 2 ár.

Fyrimunirnir við eini slíkari loysn eru fleiri, og kunnu nakrir nevnast:

1) Bygningurin er liðugt bygdur og stórt sæð væl egnaður til røktarheim. Tað verður ein skjót loysn.
2) Tað verða í fyrsta umfari fleiri pláss, enn eitt nýbygt røktarheim kann veita.
3) Loysnin verður nógv bfligari enn at byggja eitt nýtt heim.
4) Heimið liggur í útjaðaranum av hospitalsøkinum, men kortini so nær við, at eitt ávíst samband við sjúkrahúsið kann varðveitast.
5) Tá ið eitt so stórt røktarheim er tøkt, kunnu tey manglandi plássini fáast til vega við fleiri smærri røktarheimum.
6) Kommunan kann nýta meira av síni orku til at taka sær av ellisheimsspurninginum og eldraíbúðum v.m.
7) Peningurin, sum annars skuldi verið nýttur til nýtt røktarheim, kann nýtast yvir nøkur fá ár til fleiri heim, bæði vistarheim, ansingarheim og umlættingarheim til andsveik og kanska onnur brekað.

Sosiala nevndin hevur undir viðgerðini av málinum havt fund við:

Umboð fyri Tórshavnar kommunu
Umboð fyri felagið Javna
Umboð fyri stýrið og fyrisitingina á Landssjúkrahúsinum
Umboð fyri læknaráðið á Landssjúkrahúsinum
Umboð fyri andveikraverndina og leiðaran av deildunum á Eirargarði 14-16
Ein kommunulækna í Havn
Landslæknan
Umboð fyri foreldur og avvarðandi hjá búfólki á Eirargarði 14-16.

Aftan á drúgva viðgerð og umhugsan er partur av sosialu nevndini komin til ta niðurstøðu, at tá ið fíggjarvánir, tíðarætlanir og átroðkandi tørvur á røktarheimum verður havdur í huga, samstundis sum ein loysn í andveikraverndini kann fáast til vega, er besta loysnin tann, at Eirargarður 14-16 verður brúktur til røktarheim, og nóg mikið av smærri húsum verður bygt ella keypt til tørvin hjá teimum evnaveiku. Samstundis eigur ein nýggj raðfesting at verða gjørd fyri írestandi smærri røktarheimum, bæði í Havnini og t.d. í Sandoynni og í Norðstreymoy.

Við vilja er ikki umrøtt íbúðir ella heimapleyga fyri tey, sum hava møguleika til at nýta hesa loysn, bæði innan eldraforsorgina, andveikraforsorgina og á øllum øðrum økjum. Hetta metir nevndin sjálvandi skal loysast samstundis, so valmøguleikarnir hjá brúkarunum altíð vera til staðar.

Fyri at fremja her nevndu ætlanir má landsstýrið føra ymiskar samráðingar, helst eisini við danskar myndugleikar, eins og heimildarlógir

skulu gerast.

Nevndin hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein og Karin Kjølbro) setir samsvarandi frammanfyri standandi viðmerkingum fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið heimilar landsstýrinum at útvega teir neyðugu bygningar til at taka ímóti teimum persónum, sum kunnu og vilja flyta frá deildunum Eirargarður 14-16. Sama heimild er til neyðuga víðari útbygging av andveikraforsorgini. Neyðug lógaruppskot verða at leggja fyri tingið skjótast gjørligt.
2. Landsstýrinum er heimilað, tá ið deildirnar Eirargarður 14-16 eru tøkar, at nýta tær til røktarheim og at lata gera átroðkandi bygningsumvælingar í hesum sambandi.

Ein annar minniluti (Eli Nolsøe og Frederik Olsen) er kunnugur við, at landsstýrið arbeiðir við málinum um røktarheimsbygging, og mælir til at senda landsstýrinum málið.

Ein triði minniluti (Jóannes Dalsgaard) vísir til tann ovurstóra tørvin, ið er á røktarheimsheimsplássum í Suðurstreymoy, og á tær ótolandi umstøðurnar á røktardeildini á Landssjúkrahúsinum.

Eftir teimum upplýsingum, sum eru komnar fram frá sjúkrasystraráðnum, sjúkrahússtjóranum og frá røktarheimsbólkinum, fer talið av gomlum fólki støðugt at vaksa fram til ár 2000. Talið á teimum, beinleiðis hava tørv á røktarheimsplássi, liggur um 60 í løtuni, men nógv bendir á, at hetta tal er ov lágt sett.

Nevndarviðgerðin hevur til fulnar váttað henda tørv.

Undir nevndarviðgerðini eru aðrir møguleikar enn nýbygging av røktarheimi umhugsaðir. Tann mest áhugaverdi møguleikin er tann at yvirtaka Eirargarð 14-16, sum í løtuni er heim fyri 48 evnaveik í øllum aldrum.

Hesin spurningur er áhugaverdur í øðrum samanhangi, men hevur Javnaðarflokkurin tó ikki kunnað góðtikið, at røktarheimsspurningurin verður loystur á henda hátt. Undir viðgerðini hevur ógvuliga nógv verið talað um, hvørt Eirargarður er væl hóskandi til røktarheim ella ikki. Fleiri hava mælt til, og fleiri hava mælt frá at nýta hesi hús. Javnaðarflokkurin metir ikki, at Eirargarður er hóskandi, sjálvt eftir umfatandi umbyggingar.

Høvuðsgrundin til hesa støðu floksins er tann, at sjálv húsini og serstakliga plaseringin á sjúkrahúsøki ikki er hóskandi til varandi uppihald.

Onnur grundin er henda, at tað, sum ikki er hóskandi til evnaveik fólk, kann heldur ikki vera hóskandi til røktarsjúklingar.

Tann triðja høvuðsgrundin er hon, at ein hevur varhugan av, at Eirargarður sum røktarheim — solciðis sum umstøðurnar eru — verður ein fyribils loysn, ið kemur at vara í mong ár, og kann henda loysn tí forða fyri, at nýggj ellis- og røktarheim fara at verða bygd í Suðurstreymoy.

Minnilutin minnir á, at røktarheimsspurningurin í stóran mun er ein kommunalur spurningur og sostatt eisini er ein spurningur um kommunalt og annað lokalt initiativ. Tórshavnar kommuna hevur tikið tey neyðturviligu stigini. Býráðið hevur samtykt, at byggjast skulu bæði ellis- og røktarheim. Ein høvuðsfortreytin fyri, at Tórshavnar býráð og møguliga aðrar kommunur í Suðurstreymoy við kunnu fara undir at projektera ellis- og røktarheimini liðug, er hon, at vissa fæst fyri, at peningur er í grunninum fyri ansingar- og røktarheim.

Út frá hesum mælir Javnaðarflokkurin til at samtykkja uppskot floksins um lántøku til grunnin, tó so at lániheimildin verður hækkað upp í 50 mió. kr., og setir minnilutin tí fram soljóðandi

**broytingaruppskot**
**til**
**lógaruppskotið**

Í §1 verður »30 mió. kr.« broytt til: »50 mió. kr.«

I §1 ændres »30 mio. kr. til: »50 mio. kr.«

Sum longu nevnt er spurningurin um at lata tey, sum kunnu og vilja flyta frá Eirargarði 14-16 í smærri eindir, hús, ið meira eru at meta sum eitt vanligt heim, reistur undir nevndarviðgerðini, og tekur minnilutin undir við teimum flestu viðmerkingunum hesum viðvíkjandi. Hugskotið hevur áður verið frammi á aðalfundum hjá felagnum Javna, í Ári teirra Brekaðu og millum manna. Felagið Javni og foreldraráðið við Eirargarð taka heitt undir við hesum hugskoti, men umboð teirra áløgdu á fundum við nevndina stóran dent á, at henda útflyting eigur at fara fram undir tryggum umstøðum í allar mátar.

Javnaðarflokkurin heldur, at tað ber væl til at samtykkja hesa útflyting, og tekur tí undir við Jógvani Sundstein og Karini Kjølbro í hesum punkti, men heldur sum nevnt ikki, at tað er rætt at nýta tey pláss, sum gerast tøk á Eirargarði, til røktarsjúklingar. Viðmerkjast skal eisini, at tikið verður undir við tí treyt, at ein møgulig útflyting frá Eirargarði fer fram í samráð við foreldur og avvarðandi myndugleikar.

Minnilutin heldur tó ongan iva vera um, at nógvir stovnar og nógvir samfelagsbólkar kunnu nýta Eirargarð, og vísir til tey skilagóðu uppskotini frá Ári teirra brekaðu og frá »Hafnia-fundinum« um smáar bústaðareindir fyri verandi búfólk á Eirargarði.

Út frá hesum tekur Javnaðarflokkurin undir við pkt. 1 í uppskotinum til samtyktar hjá Jógvani Sundstein og Karini Kjølbro, men setir í staðin fyri pkt. 2 fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd umboðandi Landssjúkrahúsið, Andveikraverndina, býráðið og Landsskúlafyrisitingina til at taka avgerð um, hvat húsini Eirargarður 14-16 skulu nýtast til, so hvørt sum hesi hús verða leys.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið frá Jóannes Dalsgaard § 1 fall við 10-0. Broytingaruppskot til § 1 frá minniluta í sosialu nevndini fall við 10-0. Uppskot til samtyktar frá Javnaðarflokkinum fall við 14-0, og uppskot til samtyktar frá Karini Kjølbro og Jógvan Sundstein pkt. 1 samtykt við 22-0, pkt. 2 fall við 15-0.

---

# 9. Avtala millum Føroyar og Ísland um lodnuveiðu

Ár 1982, hósdagin 9. september legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 12. august 1982 um fyribils bann fyri lodnuveiðu við Eysturgrønland.

**Viðmerkingar:**

1. Sambært skipan frá 1. februar 1982 millum EEC og Føroyar um sínámillum fiskirættindi í 1982 varð avtalað, at føroyingar í 1982 kundu veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland.
2. Eftir at vísindamenn seinasta vetur komu til tað úrslit, at lodnustovnurin, ið ferðast á havøkjunum við Ísland, Jan Mayen og Eysturgrønland, var í ógvuliga stórum vanda fyri at týnast, vórðu fundir hildnir ímillum teir partar, ið hava yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi á hesum trimum havøkjum, nevniliga Ísland, Noreg og EF.

   Umboð fyri hesar tríggjar partar samdust á fundi í Oslo 13. juli 1982 um at mæla myndugleikum sínum til at banna allari lodnuveiðu, inntil vísindaliga nevndin (ACFM) hjá altjóða fiskirannsóknarstovninum (ICES) aftur ráddi til uppafturtøku av veiðuni, ella trygd var fingin fyri, at gýtingarstovnurin varð komin upp um aftur 400.000 tons.
3. Føroya landsstýri gjørdi EF-kommissiónina vara við, at um so varð, at lodnubann varð innført við Eysturgrønland, áttu Føroyar rætt til endurgjald fyri henda miss sambært sínámillum fiskiveiðuavtaluna millum Føroyar og EF. Mint varð í hesum sambandi á orðingina í sáttmálanum um, at partarnir skulu samráðast við tí í hyggju at áseta eina toskakvotu til Føroyar við Grønland, um so var, at slíkur fiskiskapur varð loyvdur øðrum ikki-grønlendingum.

   EF-kommissiónin ásannaði, at slíkur fiskiskapur varð loyvdur øðrum enn grønlendingum, men sýtti fyri at samráðast um toskakvotu til Føroyar. Heldur ikki ynski frá føroyskari síðu um makrel og sild vórðu tikin til eftirtektar. Einasta endurgjald, EF vildi lata, var í hvítingsbróður, nebbasild og svartkjafti. Av tí at eykakvotur av hesum fiskasløgum ongan áhuga høvdu, varð frá føroyskari síðu tikið til eftirtektar, at tað sjálvsagt stóð EF frítt sum strandaríki at áseta lodnubann, men at EF ikki vildi bjóða Føroyum endurgjald, ið var av áhuga fyri Føroyar.
4. EF tók ta avleiðing av, at tað ikki eydnaðist at semjast við Føroyar um endurgjald, at teir boðaðu Íslandi og Noregi frá, at teir vildu

góðtaka avtaluna um lodnubann fyri teirra egnu fiskifør, men tóku fyrivarni viðvíkjandi teimum 10.000 tonsunum, ið teir høvdu givið føroyingum loyvi at fiska við Eysturgrønland.

5. Íslendskir myndugleikar vendu sær síðani til landsstýrið, greiddu frá tí álvarsomu støðuni hjá lodnustovninum og spurdu, um føroyingar vildu átaka sær eins og hinir partarnir fyribils at lata vera við at fiska burtur av lodnustovninum.

   Við tí góðu samvinnuni, ið er millum Føroyar og Ísland á fiskivinnuøkinum, í huga, mettu landsstýrið og marknaðarnevndin, at ein slík áheitan frá íslendskari síðu átti at verða viðgjørd við vælvild, og varð sostatt hjálagda brævaskifti gjørt ímillum løgmann og íslendska uttanríkismálaráðharran. Har átaka føroyingar sær at lata vera við at fiska ta lodnukvotu, ið teir hava fingið frá EF við Eysturgrønland, so leingi sum hinir partarnir heldur ikki fiska. Víst verður til protokollat viðvíkjandi lodnu frá fiskivinnusamráðingunum í Reykjavík 13. januar 1981, og í tráð við hetta verður gjørt vart við, at báðir partar kunnu taka stig til samráðingar m.a. um framhaldandi føroyska luttøku í heildarveiðuni av viðkomandi lodnustovni.

   Av tí at fiskiveiðuavtalan ímillum Føroyar og Ísland ikki er ein sínámillum veiðuavtala, kemur spurningurin um endurgjald fyri mista lodnuveiðu ikki upp á tal í hesum føri.

6. Av tí at løgtingið ikki var saman, varð avtalan gjørd við fyribils góðkenning frá løgtingsins marknaðarnevnd, jbr. løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978, § 1, seinasta petti.

Landsstýrið biður hervið um løgtingsins endaligu góðkenning av avtaluni.

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn, 12. august 1982

Harra Ólafur Jóhannesson,
uttanríkismálaráðharri.

Føroyskir myndugleikar hava fingið frágreiðing frá íslendskum myndugleikum um ta álvarsomu støðu, sum lodnustovnurin, ið heldur til í havinum við Ísland, Jan Mayen og Eysturgrønland, er komin í, og um at tey strandalond, í hvørs sjógvi henda lodna ferðast,

eru komin ásamt um at banna fiskiførum teirra at veiða lodnu inntil vísandaligar tilráðingar loyva tí.

Vísandi til tað góða samstarv, ið verið hevur ímillum Føroyar og Ísland í fiskivinnumálum og vísandi til protokoll frá fiskivinnusamráðingum í Reykjavík frá 13. januar 1981, har millum annað verður ásannað, at føroyingar viðurkenna mikla áhuga íslendinga viðvíkjandi heildarveiðu av íslendska lodnustovninum, skal Føroya landsstýri boða frá, at landsstýrið er sinnað at taka ta avgerð at banna føroyskum fiskiførum at gera nýtslu av teimum loyvum, ið tey hava fingið frá Europeiska Búskaparliga Felagsskapinum til at veiða lodnu við Eysturgrønland, í tí tíðarskeiði, ið slík veiða er bannað øðrum fiskiførum.

Føroyingar og íslendingar eru samdir um at hava samráðingar um støðuna hjá lodnustovninum, tá ið annar ella báðir partar biðja um tað, m.a. um framhaldandi føroyska luttøku í heildarveiðuni, sum umrøtt er í protokolati partanna millum um samvinnu í fiskiveiðu- og landgrunsmálum frá 13. januar 1981.

Um so er, at íslendska stjórnin kann vátta, at hon er samd í omanfyristandandi, vil Føroya landsstýri meta brævaskiftið um hetta sum eina avtalu partanna millum.

Pauli Ellefsen
løgmaður

Uttanríkisráðuneytið
13, ágúst 1982

Herra lögmaður,

Ég hefi í dag móttekið bréf yðar, dags. í dag, sem hljóðar þannig:

»Íslendsk stjórnvöld hafa skýrt færeyskum stjórnvöldum frá hinu alvarlega ástandi loðnustofnsins á hafsvæðunum milli Íslands, Jan Mayen og Austur-Grænlands, svo og að þau strandríki, sem umráð hafa yfir þessum hafsvæðum, hafi orðið ásátt um að banna fiskiskipum sínum loðnuveiðar þar til vísindarannsóknir gefa til kynna að slíkar veiðar megi stunda.

Með hliðsjón af því góða samstarfi, sem verið hefur milli Íslendinga og Færeyinga í fiskveiðimálum og með tilvísum til bókunar frá fiskveiðiviðræðum aðila í Reykjavík hinn 13. janúar 1981, þar sem m.a. var staðfest, að Færeyingar viðurkenna hina mikilvægu hagsmuni Íslendinga varðandi heildarveiðar á íslenska loðnustofn-

inum, vill landsstjórn Færeyja skýra frá því, að hún er reiðubúin að taka ákvørðun um að banna færeyskum fiskiskipum að notfæra sér þau leyfi, sem þau hafa fengið frá Efnahagsbandalagi Evrópu til loðnuveiða við Austur-Grænland, á þeim tíma sem slíkar veiðar eru bannaðar öðrum fiskiskipum.

Íslendingar og Færeyingar eru sammála um að halda samráðsfundi um ástand loðnustofnsins þegar annar hvor eða báðir aðilar óska eftir því og fjalla þá m.a. um áframhaldandi þátttöku Færeyinga í heildarveiðunum, eins og kveðið er á um í bókum aðila um samvinnu í fiskveiði- og landgrunnsmálum frá 13. janúar 1981.

Geti ríkisstjórn Íslands staðfest að hún sé samþykk framangreindu mun landsstjórn Færeyja líta á þessi bréfaskipti sem samkomulag milli aðilanna.«

Ég leyfi mér hér með að tilkynna yður, hr. løgmaður, að ríkisstjórn Íslands er samþykk framangreindu og mun líta á þessi bréfaskipti sem samkomulag milli aðilanna.

Ólafur Jóhannesson

Hr. Pauli Ellefsen, lögmaður
Föroya landsstýri
Torshavn

1. viðgerð 13. september. Málið beint í marknaðarnevndina, sum 17. í s.m. legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fyri tingið av landsstýrinum 9. september og við fyrstu viðgerð tann 13. september beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur fyribils góðkent avtaluna.

Eftir at norðmenn, íslendingar og EEC eftir tilmæli frá vísindamonnum vóru samdir um ikki at fiska lodnu við Jan Mayen, Island og Eysturgrønland, komu føroyingar í eina tvørliga støðu.

Sambært fiskiveiðusáttmála okkara við EEC høvdu føroyingar rætt til at fiska 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland.

Royndir vórðu gjørdar at fáa loyvi at fiska annan fisk í EEC sjógvi fyri ta lodnu, vit høvdu rætt at fiska við Eysturgrønland, men tær

miseydnaðust. Vit fingu ikki loyvi at fiska annað í staðin enn tað, vit høvdu ov mikið av frammanundan, men EEC noktaði okkum ikki at fiska loyvdu mongdina av lodnu við Eysturgrønland.

Marknaðarnevndin er sera misnøgd við, at EEC ikki kundi veita okkum aðrar fiskimøguleikar í teirra sjógvi.

Íslendingar heittu á okkum um ikki at fiska lodnu í ár.

Um vit ikki gingu áheitan teirra á møti, so hevði møguliga avtalan um veiðisteðg, sum Ísland og Noreg høvdu fingið EEC at ganga við til, verið av ongum við tí úrsliti, at ikki bert vit fiskaðu har, men eisini EEC skip.

Marknaðarnevndin metti, at tað kundi fáa álvarsligar fylgjur fyri góða samstarv okkara við íslendingar í fiskivinnumálum, um vit einsamallir fóru at fiska lodnu, og enn álvarsligari fylgjur, um vit vóru atvoldin í, at EEC skip eisini fóru hagar at fiska í summar.

Við hesum í huga góðtók marknaðarnevndin fyribils avtaluna millum Føroyar og Ísland um ikki at fiska lodnu við Eysturgrønland, so leingi eingin annar fiskaði av tí stovninum.

Í fiskiveiðisáttmálanum millum Føroyar og EEC stendur, at samráðingar skulu takast upp um áseting av toskakvotu til føroyingar í Grønlandi, um so er, at aðrir enn grønlendingar fáa loyvi at fiska tosk í Grønlandi.

Tað er vorðið heilt greitt, at grønlendingar ikki verða førir fyri at fiska ta mongd av toski og rækjum, sum vísindamenn meta stovnarnar tola, í 1982.

Aðrir enn grønlendingar hava fingið loyvi at fiska tosk í grønlendskum sjógvi.

Føroyingar hava ikki havt veruligan møguleika at fiska lodnuna við Eysturgrønland, sum EEC hevur fingið veiðirættindi við Føroyar fyri, tí eiga vit enn betri rætt nú, enn tá sáttmálin varð skrivaður, at fáa loyvi at fiska tosk og rækjur í Grønlandi, um skrivaða orðið í veiðisáttmálanum skal hava nakran týdning.

Marknaðarnevndin heitir á landsstýrið um beinanvegin at krevja tær samráðingar um fiskiskap í Grønlandi, sum eru nevndar í fiskiveiðisáttmálanum við EEC.

Ein samd marknaðarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) viðmerkir, at landsstýrið eina ferð enn hevur boygt seg fyri yvirgangi EEC's í sínámillum fiskivinnumálum við at lata frá sær lodnukvotu upp á 10.000 tons uttan nakað endurgjald aftur fyri, serliga tí minnilutin heldur tað vera rætt at friða hóttar fiskastovnar.

Samstundis vil minnilutin gera vart við, at landsstýrið yvir fyri EEC

eigur at krevja av teimum, at teir beinan vegin í hesum árinum útvega okkum veruligar fiskimøguleikar, sum kunnu vera afturfyri henda miss.

2. viðgerð 17. september. Uppskotið varð samtykt við 32-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-2-4

---

# 10. Uppískoytissáttmáli millum Føroyar og Noreg um makrel- og upsaveiðu í 1982

Ár 1982, hósdagin 9. september legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 5. august 1982 um eyka-kvotur av makreli og upsa fyri 1982.

**Viðmerkingar:**
Sambært skipan frá 29. januar 1982 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1982 varð avtalað ein sínámillum royndarveiða av makreli innan fyri eina kvotu uppá 4.000 tons til hvønn partin.

Fiskarídirektørurin í Bergen vendi sær 4. august 1982 pr. telex til landsstýrið og bað um, at báðar kvoturnar vórðu øktar frá 4.000 til 10.000 tons norðan fyri 62°.

Landsstýrið svaraði 5. august 1982 pr. telex, at tað kundi ganga norska ynskinum á møti um at økja norsku kvotuna frá 4.000 tónsum

til 10.000 tons, men ynskti, at tann føroyska makrelkvotan varð økt frá 4.000 til 8.000 tons, og tann føroyska upsakvotan í norska partinum av Norðsjónum varð økt frá 1.200 til 1.800 tons, t.e. við 600 tonsum, og at talið av norskum nótaskipum á Føroyaøkinum varð avmarkað til 20 í senn.

Tað føroyska ynskið varð pr. telex tann 5. august 1982 gingið á møti.

Telexskifti partanna millum er hjálagt sum skjal I-IV.

Av tí at løgtingið ikki var saman, varð avtalan gjørd við fyribils góðkenning frá løgtingsins marknaðarnevnd, jbr. løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978, grein 1, seinasta petti.

Landsstýrið biður hervið um løgtingsins endaligu góðkenning av avtaluni.

*+ skjøl*

* 12.33

* 12.35 +
81310 fiskvb fa
* 080 amf n
* this stored message comes from
* 42151 fdirk n

* bergen, 4.8.1982

* faeroeysk landsstyre
* fiskivinnustovan
* thorshavn
* faeroeyane

* makrellfisket i faeroeysk sone 1982..
pr. 4/8 kl. 0900 er det innmeldt ca. 2500 tonn makrell fra 14 fartoey i faeroeysk sone.

tatt i betraktning det store antall fatoey i sonen, er det sannsynlig at 4000 tonn makrell i faeroeysk sone blir for lite.

paa denne bakgrund foreslaar vi at de gjensidige kvoter av makrell

nord for 62 greader n oekes fra 4000 tonn til 10.000 tonn.

en ber samtidig om anledning til paa et senere tidspunkt åa komme tilbake ti spørsmaalet dersom partene skulle vaere iuterressert
i aa oeke dc gjensidige makrellkvotenc ytterligere.

vi ber om snarlig svar paa denne henvendelse, og haaper at vi senere kan komme tilbake hvis det er behov for stoerre kvote.
kopi pr. telex til fiskeridepartementet

* fiskeridirektoer
* + + ★
81310 fiskvb fa

fiskeridirektøren
bergen

under henvisning til fiskeridirektoratets telex af 4.8., hvori der anmodes om en forhøjelse af den gensidige kvote af makrel, n.f. 62 grader n, for 1982 fra 4.000 tons til 10.000 tons skal farøernes landsstyre bemarke følgende:

p.g.a. lille færøsk fangstkapacitet er der ikke noget stærkt ønske fra færøsk side om forhøjelse af makrelkvoten.

ud fra et ønske om godt og friktionsfrit fiskerisamarbejde mellem færøerne og norge, både i 1982 og efterfølgende år, vil man fra færøsk side imødekomme det norske ønske om en forhøjelse af makrelkvoten fra 4.000 tons med 6.000 tons til 10.000 tons.

det hidtidige antal licenser til makrelfiskeri kan forblive i kraft, men af hensyn til opretholdelsen af ordnede forhold på feltet, vil der fra 5.8 kl. 12 gmt kun blive tilladt 20 norske makrelfartøjer i fiskerizonen

samtidig. fra færøsk side ønsker man samtidig en forhøjelse af den færøske seikvote for 1982 i norsk zone i nordsøen fra 1.200 tons med 600 tons til 1.800 tons.

for tilnærmelsesvis at opretholde den formelle balance i de samlede kvoter for de to parter vil man endvidere ønske den færøske makrelkvote i norsk zone forhøjet med 4.000 tons til 8.000 tons.

en eventuel senere henvendelse om en yderligere forhøjelse vil ligeledes blive optaget til positiv overvejelse.

hvis man fra norsk side kan godkende den ovenfor beskrevne ordning bedes det bekræftet over for landsstyret pr. telex, hvorefter denne telexveksling vil blive betragtet som en tillægsaftale vedr. 1982 imellem vore to parter.

for færøernes landsstyre
arni olafsson, kontorchef

p.s.

az

i fortsættelse af det ovenfor udtrykte om et friktionsfrit samarbejde skal landsstyret benytte anledning til at minde om tidligere telefonisk fremsatte ønsker om norske fiskerimyndigheders kommentarer til omstændighederne omkring opbringningen og bødeforlægget til den færøske industritrawler ''fuglfirdingur'', der som omtalt har givet anledning til bekymring på færøerne for færøske fartøjers retssikkerhed i norsk zone.

færøernes landsstyre

+
81327 vbl fa
81235 tingns fa

skjal III

10,33

10,36
81310 fiskvb fa

bergen, 5.8.1982

faeroeyanes landsstyre
torshavn
faeroeyane

att. olavsson

endring i den gjensidige makrellkvote og i faeoroeysk seikvote i norsk oekonomisk sone soer for 62 grader n.br.

en viser til landsstyrets telex av 4.d.m.

en godtar landsstyrets tilbud om oekning af den norske makrellkvoten i faeroeysk sone fra 4.000 tonn til 10.000 tonn mot oekning av den faeroeyske makrellkvoten i norskoekonomisk sone nord
for 62 grader n.br. fra 4.000 tonn til 8.000 samt oekning av den faeroeyske seikvoten soer for 62 grader n br . med 600 tonn fra 1.200 tonn til 1.800 tonn.

av praktiske grunner kan den foreslaatte toernordning begrenset til 20 norske fartoey i faeroeysk sone samtidig, tidligst kunne la seg gjennomfoere fra og med kl. 1200 gmt den 6.d.m..

en vil be iom en slik utsettelse.

fiskeridirektoeren vil foelge med i utviklingen i fisket og fastsette fiskestopp naar kvoten paa 10.000 tonn er beregnet oppfisket.

en imoeteser landsstyets svar.

fiskeridirektoer

81310 fiskvb fa
42151 fdirk n

skjal 1V

jtu
14.40
42151 fdirk n
81235 tingns fa

torshavn, 5. aug. 1982, kl. 13.44

til fiskeridirektoratet
bergen

vedr. kvoter for færøsk-norsk makrelfiskeri 1982.

færøernes landsstyre har modtaget fiskeridirektoratets telex af d.d. med norsk bekræftelse af, at norges kvote for makrel i færøsk zone forhøjes til 10.000 t, færøernes kvote for makrel i norsk zone til 8.000 t og sei til 1.800 t.

vedrørende antal norske makrelfartøjer i færøsk zone er man under hensyntagen til de praktiske problemer indforstået med at regelen om maksimalt 20 fartøjer i zonen ad gangen først håndhæves fra 6/8 kl. 1200 gmt, idet man går ud fra, at man fra norsk side indtil da i videst muligt omfang forsøger at holde antallet nede.

færøernes landsstyre

42151 fdirk n
81235 tingns fa

1. viðgerð 13. sept. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 17 í s.m. legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fyri tingið av landsstýrinum 9. september 1982 og varð við 1. viðgerð 13. september beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Jógvan Olsen, Atli Dam og Hilmar Kass) hevur fyribils góðkent avtaluna.

Norðmenn høvdu rætt at veiða 4.000 tons av makreli í føroyskum sjógvi, og føroyingar høvdu rætt at veiða 4.000 tons í norskum sjógvi í 1982.

Fyrst í august høvdu norðmenn fiskað ta loyvdu mongdina a makreli. Fiskaristjórin í Bergen heitti á landsstýrið um loyvi at fiska 6.000 tons afturat, móti at føroyingar eisini fingu loyvi at fiska 6.000 tons meira í norskum sjógvi.

Norðmenn høvdu fingið ógvuliga lítið av tí mongd av svartkjafti, teir høvdu loyvi at fiska í ár. Við tí í huga og av tí at mett varð, at tað hevði týdning fyri okkum at fáa meira at vita um gongdina hjá makrelinum norðan fyri Føroyar, fingu norðmenn loyvi at fiska ta umbidnu mongdina, hóast útlit ikki var til, at føroyingar fóru at fiska loyvda makrelin í norskum sjógvi, men tann mongd, vit høvdu loyvi at fiska av upsa í Norðsjónum, var nærum uppfiskað.

Semja var gjørd við norska fiskaristjóran um, at føroyingar kundu fiska 600 tons av upsa afturat í Norðsjónum og 4.000 tons meira av makreli norðan fyri 62° N í norskum sjógvi.

Meirilutin (Jógvan Olsen, Svend Aage Ellefsen, Jógvan Sundstein, Jørgen Thomsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Petur Reinert) metir málið um hesar pappírskvotur at vera avgjørt, og er tí einki annað at gera enn at taka tað til eftirtektar.

2. viðgerð 17. september. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-4-2

# 11. Avreiðing og/ella avheinting av útróðrarfiski

Ár 1982, hósdagin 9. september legði Hilmar Bech, løgtingsmaður, vegna Ova Mikkelsen, Atla Dam og seg sjálvan fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum í samráð við fiskakeyparar at skipa soleiðis fyri, at útróðrarfiskur kann avreiðast og/ella avheintast á plássum, har eingin fiskakeypari er.

**Viðmerkingar:**

Hóast reglurnar fyri flutningi av útróðrarfiski eru broyttar, og flutningsstudningurin fleiri ferðir er hækkaður tey seinastu árini, er tað framvegis trupult hjá útróðrarmonnum á summum plássum at sleppa av við veiðuna.

Tað kemur fyri, at menn aftan á langar og strævnar útróðrardagar mugu nýta nógva tíð og baks fyri at sleppa av við fiskin, og tann studningur, sum verður latin fyri flutning við bili, dekkar ikki altíð tær veruligu flutningsútreiðslurnar.

Slík viðurskifti gera, at møguleikarnir til at reka útróður eru munandi verri á summum plássum enn aðrastaðni, og hetta tekur ofta hugin frá monnum til at fara á flot. Hugtakið bygdamenning hevur so mangan verið frammi ta seinastu tíðina, og skal nøkur meining vera aftan fyri hetta hugtak, so eiga politisku myndugleikarnir at virka við til at laga viðurskiftini soleiðis, at útróðrarmenn í bygdum, har eingi fiskavirki eru, kunnu hava møguleikar til at sleppa av við veiðuna, so lagaliga sum tað letur so gera.

Tí eigur landsstýrið í samráð við fiskakeyparar at skipa soleiðis fyri, at útróðrarfiskur kann avreiðast og/ella avheintast á plássum, har eingi fiskavirki eru.

Meirútreiðslur, ið standast av tílíkari skipan, eiga fiskakeyparar at fáa endurgoldnar úr landskassanum.

1. viðgerð 13. sept. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum

3. mai 1983 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er framlagt 9. september 1982 av Hilmar Bech, Ove Mikkelsen, Atla Dam, Adolf Hansen, Juul Jacobsen, Hans M. Joensen og Tóralvi Mohr Olsen og við 1. viðgerð 13. september beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur Dam Jacobsen, Frederik Olsen, Olaf Olsen og Jógvan Olsen) metir, at um hetta uppskot verður samtykt, so verður landsstýrinum álagt at taka ímóti fiski í øllum teimum bygdum, har eingin fiskakeypari er, og tað er meginparturin av føroysku bygdunum, hetta verður ein alt ov stórur kostnaður hjá landskassanum í mun til tær nøgdir, talan kann verða um.

Lógin um flutningsstudning er seinast broytt í 1981. Eftir henni verða 15 oyru/kg latin honum, ið ber flutningsútreiðslurnar.

Meirilutin mælir til, at 15 oyru pr. kg. verða hækkað til 20 oyru pr. kg, og setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á løgtingið, tá viðgerðin kemur fyri um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, at hækka flutningsstudningin til 20 oyru pr. kg.

Minnilutin (Juul Jacobsen, Tóralvur Mohr Olsen og Hans M. Joensen) mælir til í fyrsta lagi at samtykkja uppskotið, og í øðrum lagi tekur sami minniluti undir við uppskotinum til samtyktar frá meirilutanum.

2. viðgerð 4. mai. Uppskotið frá Hilmar Bech v.fl. fall við 14-0. Uppskot frá meiriluta í nevndini samtykt við 29-0 atkvøðum.

# 12. Broyting í forsorgarlóginí og barnaforsorgarlóginí

Ár 1982, hósdagin 9. september legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri Fólkatingið hjáløgdu uppskot til »Lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg« og »Lov om ændring af lov for Færøerne om børneforsorg«.

**Viðmerkingar:**
Í 1976 kom í Danmark í gildi hjálparveitingarlóg (bistandslov) í staðin fyri forsorgarlóg og barnaforsorgarlóg.

Hjálparveitingarlógin hevði við sær ymsar broytingar, sum kunnu býtast í tvey.

Í fyrstu syftu hevði lógin við sær fyrisitingarligar broytingar, serliga soleiðis at tey, sum høvdu tørv á hjálp, ikki skuldu fara til nógvar ymsar stovnar, men bert til viðkomandi kommunu.

Í aðru syftu vórðu gjørdar broytingar, sum miðaðu ímóti, at tey, sum tørvaðu hjálp, kundu fáa betri ella størri hjálp.

Tá var nógv orðaskifti, um broytingin av lóggávuni var hóskandi yvirhøvur, og um reglurnar svaraðu til endamálið.

Landsstýrið tók ta støðu ikki at fara undir at gera eina hjálparveitingarlóg galdandi fyri Føroyar, men at bíðast skuldi eftir royndunum í Danmark. Á fyrisitingarliga økinum var ikki so stórur tørvur á broytingum sum í Danmark, tí øll sosiala umsitingin var savnað í einum staði, nevniliga á Almannastovuni, við undantak av sosialu umsitingunum í kommunum við yvir 2000 íbúgvum. Hin vegin helt landsstýrið, at teir øktu fyrimunirnir fyri tey, sum tørvaðu hjálp, áttu at gerast galdandi eisini í Føroyum, og at tað mest hóskandi var at lata hetta fáa skap av broytingum í verandi forsorgarlóg.

Í galdandi lóg eru reglur í § 15 í forsorgarlóginí um veitan av víðkaðari hjálp í ávísum førum, tá sjúka berst á, men eru treytirnar heldur strangar. Tá hesar strongu treytir eru loknar, verður hjálp veitt

(útroknað) á tann hátt, at avsett verður peningaupphædd (grundupphædd av fólkapensjónini), og verða haraftrat lagdar fastar útreiðslur hjá viðkomandi.

Um viðkomandi ikki kemur undir §15, kann hjálp veitast støkum uppihaldarum eftir §22.

Um viðkomandi ikki kemur undir §15 ella §22, og annars í øllum førum, har viðkomandi ikki kemur undir serligar reglur í almannalóggávuni (avlamispensjón, dagpening og endurbúgving), fær viðkomandi hjálp eftir §9 í forsorgarlógini.

Hjálpin eftir §9 (og §22) hava í at kalla øllum førum somu støddsum grunduppheddin av fólkapensjón við pensjónsviðbót og møguligari barnaviðbót.

Tá talan er um arbeiðsloysi, eru reglurnar í §9 galdandi, og bera tær í sær, at hjálpin er heldur lág, og at inntøkan hjá hjúnafelaga verður drigin frá krónu fyri krónu.

Høvuðsbroytingin í uppskotinum er, at meginparturin av teimum, sum nú bert kunnu fáa lítla upphædd, eftir §9 í uppskotinum kunnu fáa fyribilshjálp avmarkað til hægstu upphæddina fyri sjúkradagpening.

Arbeiðsloysi verður eisini grund fyri hjálp sambært §9 í uppskotinum, og heldur landsstýrið, at tað sostatt verða rímiligir møguleikar fyri at hjálpa fólki, ið verður rakt av veruligum arbeiðsloysi, og skuldi hetta ført við sær, at tørvur ikki verður á serstakari skipan fyri arbeiðsleys.

Millum tey, sum í løtuni fáa hjálp eftir §9, eru nøkur fólk, sum av ymsum orsøkum inegu haldast hava varandi tørv á hjálp, sjálvt um tey ikki koma undir t.d. avlamispensjón, og koma tey undir §13 í uppskotinum um varandi hjálp, sum er tann sama, sum hjálp eftir §9 er nú. Hin vegin er tann hægra hjálpin eftir §9 í uppskotinum avmarkað til tey, sum kunnu haldast bert at tørva hjálp eitt avmarkað tíðarskeið.

Nýggja orðingin av §33 í uppskotinum hevur møguleika fyri, at kommunur, ið ynskja tað, kunnu taka sær av sosialu umsitingini, og samsvarar hetta við løgtingssamtyktina í løgtingsmáli nr. 94/1975.

Annars er tað umráðandi, at tey, sum tørva hjálp, fáa somu viðgerð, tá nýggja skipanin kemur í gildi, og líka mikið, hvar tey búgva.

Sambært broytingina av §32, stk. 1, í forsorgarlógini, kann landsstýrið sjálvt taka støðu til stovnsseting av stovnum. Hetta samsvarar við §34 í avlamispensjónslógini, sum heimilar landsstýrinum at seta á stovn stovnar, har ríkisstýrið uttan samráðing rindar helvtina av rakstrarútreiðslunum. Hin vegin skal landsstýrið sambært §40, nr. 7 í forsorgarlógini, sum ikki verður broytt innihaldsliga í uppskotinum,

samráðast við ríkismyndugleikarnar um gjald av rakstrarútreiðslunum av stovnum, ið verða skipaðir eftir hesi lóg.

Tað er ein fyritreyt hjá landsstýrinum, at býtið av rakstrarútreiðslunum millum landið og ríkið ikki verða broyttar av nýggju orðingini.

Meirútreiðslurnar av hesum uppskoti verða mettar til 6 mió. kr., ið verða býttar við 1,1 mió. kr. til statin og 4,9 mió. kr. til landskassan. Haraftrat koma útreiðslur til økta umsiting á Almannastovuni, umleið 0,4 mió. kr. til 3 starvsfólk, og umleið 2-300.000 kr. í øktum fyrisitingarútreiðslum hjá kommununum. Annars verður vísst til viðmerkingarnar, sum almannamálaráðið hevur gjørt.

16. september boðaði formaðurin frá skrivi frá einum meiriluta í landsstýrinum — Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum — sum hevur álagt Eilif Samuelsen, landsstýrismanni, at taka løgtingsmál nr. 12: Broyting í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini aftur.

Skrivið var soljóðandi:

Málið var sostatt afturtikið.

F.L. 1010-5

# 13. Studningur til veiðu av lodnu

Ár 1982, mánadagin 13. september legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um studning til veiðu av lodnu.**

§ **1.** Til landingar av lodnu frá føroyskum fiskifari í Føroyum verður í flutningsstuðningi latið til skipið 10 oyru/kg av tí lodnu, ið avreidd er aftan á 10. september 1982.

§ **2.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**lagtingslov om tilskud til fangst af lodde.**

§ **1.** Til landing af lodde fra færøske fiskefartøjer på Færøerne ydes i transporttilskud til skibet 10 øre/kg af den lodde, der er indhandlet efter 10. september 1982.

§ **2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur fingið soljóðandi skriv frá felagnum Nótaskip og Havsbrún í Fuglafirði, dagfest 1. september 1982:

»Nótaskip og Havsbrún eru komin í eina sera ringa støðu, av tí at hann er sett fyri lodnuveiðu við Jan-Mayen og Eysturgrønland í ár.

Einasta lodna, vit hava møguleika fyri at fáa í ár, verður væntuliga bert í norska økinum í Barentshavinum. Tá byrjað varð aftur at veiða lodnu nú í august, vóru bert 9/10.000 tons eftir av kvotuni í norska økinum, og helst verður einki at fáa í russiska økinum.

Henda nøgd kemur ikki at muna nakað til úrtøkuna hjá nótaskip-

unum við teimum prísum vit hava í dag. Harafturat kemur long siglitíð við stórari oljunýtslu, og ikki er møguleiki at avreiða í norskum havnum.

Vit fara tí at loyva at biðja um at fáa ein førningsstudning til skipið — at rokna sum ein rakstrarstudning — uppá 15 oyru fyri kilo fyri ta nøgd, ið verður landað í Føroyum við gildi frá 26. august at rokna, tá tann fyrsti báturin avreiddi lodnu í Føroyum.

Hetta vildi verið ein góð og neyðug hjálp til raksturin av skipunum og eisini ein hjálp til Havsbrún fyri ta nøgd, ið mist er á Grønlands- og Jan Mayen-leiðunum.

Vit vóna at fáa hetta ynski viðgjørt beinanvegin, av tí at nøgdin er so lítil og harvið veiðitíðin avmarkað.«

Skotið verður upp at játta 10 oyru/kg, og tá talan kann verða um eina nøgd uppá 5-6.000 tons, verður útreiðsla landskassans, um uppskot landsstýrisins verður samtykt, í mesta lagi 5-600.000 kr.

1. viðgerð 15. september. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. í s.m. legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 13. september 1982 og undir 1. viðgerð tann 15. september beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 16. september viðgjørt málið, og er nevndin samd um, at studningurin eigur at verða tíðaravmarkaður soleiðis, at lógin fer úr gildi 1. januar 1983.

Í skrivi dagfest 14. september 1982 hevur Føroya Fiskimannafelag heitt á løgtingið um, at tey uppskotnu 10 oyruni/kg verða býtt til manningina eisini, ella at ein serligur studningur verður latin fiskimonnum.

Meirilutin (Jóhannes Martin Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Hilmar Kass) mælir til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt við teirri broyting, sum omanfyri er tilskilað.

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) mælir til at ganga áheitanini frá Føroya Fiskimannafelag á møti, soleiðis at studningurin verður at býta millum manning og fiskifar, sum søla av veiðu verður býtt. Peningurin verður at rinda av konto §16 2490/3301, pkt. 18: Serligur grunnur til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað, ljóðandi upp á 10 mió. kr.

Ein samd fíggjarnevnd setir sostatt fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| §2 verður orðað solciðis:<br>»Henda lóg fær gildi beinan vegin og fer úr gildi 1. januar 1983.« | §2 affattes således:<br>»Denne lov træder i kraft straks og træder ud af kraft den 1. januar 1983.« |

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| Í seinasta punktum í §1 verður sett:<br>»Studningur verður at býta millum manning og fiskifar, sum søla av veiðu verður býtt.« | I § 1 sidste punktum tilføjes:<br>»Tilskuddet fordeles mellem mandskab og fiskerfartøj på samme måde som salg af fangst fordeles.« |

Atli P. Dam setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at kanna vánirnar fyri fiskamjølsframleiðslu, havandi í huga tær broytingar, ið hendar eru á hesum øki, og verður úrslitið at leggja fyri løgtingið áðrenn 1. december 1982.

2. viðgerð 17. september. Broytingaruppskot frá samdari nevnd samtykt við 27-0 atkvøðum, uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 22-0, §2 við broyting samtykt utlan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð

samtykt við 24-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá sama minniluta (Atli Dam, Ove Mikkelsen, Adolf Hansen) fall við 14-0. Uppskot til samtyktar frá minniluta samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1539-4 Lóg nr. 100 frá 30. sept. 1982

---

# 14. Veiða, viðgerð og goymsla av høgguslokki til agn

Ár 1982, mánadagin 13. september legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**1. Uppskot til**

**løgtingslóg um lán til landskassan.**

§1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna kr. 10 miliónir til veiðu, viðgerð og goymslu av høgguslokki til agn.

§2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**lagtingslov om lån til landskassen.**

§1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån på kr. 10 millioner, der skal anvendes til fangst, behandling og lagring af blæksprutter til agn.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

## II. Uppskot til samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at leiga 2 stórar togarar ella kraftblokkabátar at veiða høgguslokk við partroli. Líkaleiðis verður álagt landsstýrinum at fyriskipa viðgerð og goymslu av soleiðis fingnum høgguslokki til agn.

**Viðmerkingar:**
Seinasta ár var nógvur høgguslokkur at fáa inni á firðunum við smábátum, men mitt í bestu høgguslokkatíð góvu virkini uppat at taka ímóti. Hetta førdi við sær, at Framburðsflokkurin í (alment kunngjørdum) brævi heitti á landsstýrið um at skipa so fyri, at landið keypti og goymdi eini 1500 tons av høgguslokki.

Tíanverri varð áheitanin havnað av landsstýrinum við tí úrsliti, at tá komið var í november mánað, var sølan av høgguslokki avmarkað til bert at vera ein lítil brøkpartur av tí agni, bátarnir keyptu. Hetta førdi aftur við sær, at veiðan pr. línueind fór heilt nógv niður.

Aftur í ár er nógvur høgguslokkur á føroyaleiðini, men tíanverri kemur hann bert inn á firðirnar í smærri nøgdum, so smábátarnir hava ikki møguleika at nøkta føroyska agntørvin.

Høgguslokkurin er ein skjótt vaksandi fiskur, ið sum yvirvaksin ikki er nýtandi sum agn, og er tað tí neyðugt at veiða tær nøgdir, ið nýtast skulu til agn innan miðjan oktober.

Fyri at lýsa, hvønn týdning føroyski høgguslokkurin hevur fyri tær landaðu veiðinøgdirnar, skal vísast til úrslitið hjá 3 (annars líka) bátum, sum sama dag í seinastu viku veiddu á sama stað við línu.

Bátur A hevði 36 stampar egndar við bert føroyskum høgguslokki.
*Úrslitið gjørdist 8.000 pund.*

Bátur B hevði eisini 36 stampar, men egndi við 1/3 av føroyskum høgguslokki og 2/3 av øðrum agni.
*Úrslitið gjørdist 3.000 pund.*

Bátur C hevði líkaleiðis 36 stampar, men eingin egndur við føroyskum høgguslokki.
*Úrslitið 700 pund.*

Eitt stórt tal av øðrum bátum royndi har um leiðir henda dag, og

var úrslitið hjá teimum lutfalsliga tað sama í mun til lutfallið av agninum.

Framleiðsla av agni ber altíð í sær vandan fyri fíggjarligum tapi. Hetta ger, at virkini eru nakað afturhaldandi bæði við at uppkeypa og serstakliga við at gera íløgur í veiðuferðir eftir agni (høgguslokki/makreli).

Herrópið um, at har tað privata ikki røkkur, skal tað almenna taka við, kemur her til sín rætt.

Vetrarveiðan hjá helminginum av okkara veiðuførum, nøgdirnar á teim ymsu virkjunum og harvið virðið av landsins útflutningi eru fyri ein stóran part proportional við góðskuna av agninum. Tað er tí av størsta týdningi og bráðneyðugt, at tað almenna beinanvegin og við fullari styrki ger eina roynd at fáa sum mest av høgguslokki upp á land, áðrenn tað gerst ov seint.

Havast má í huga, at eydnast royndin, so

*minkar* hetta um innflutningin av ovurdýrum agni,
*skapar* eykainntøku til skip og manning á 2 stórum skipum,
*gevur* betri rentabilitet og størri inntøku hjá línubátum og manningum teirra,
*gevur* betri rentabilitet og størri inntøku hjá virkjunum og teimum, ið har starvast, og
*veksur* um landsins útflutningsvirði.

Alt samfelagsárin, vit ikki hava ráð at vera fyriuttan.

1. viðgerð 15. september. Málið varð við atkvøðugreiðslu, 23-0 atkvøðum, beint í fiskivinnunevndina, sum 17. september legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 13. september 1982 og við fyrstu viðgerð 15. september beint í fiskivinnunevndina.

Uppskotið er í tveimum pørtum:
I er um fíggingina upp á 10 mió. kr. av tiltakinum, og í
II verður skotið upp at áleggja landsstýrinum beinan vegin at leiga 2 stórar trolarar ella kraftblokkabátar til at fiska høgguslokk við partroli, somuleiðis verður skotið upp at áleggja landsstýrinum at fyriskipa viðgerð og goymslu av soleiðis fingnum høgguslokki til agn.

Fiskivinnunevndin hevur havt fund við umboð fyri Fiskirannsókn-

arstovuna, Birgir Simonsen og Páll Olsen. Teir greiddu frá, at royndir høvdu verið eftir høgguslokki, sum byrjaðu í august 1980, og tær hildu fram í december 1981, og nakrar royndir vóru gjørdar í 1982 við snellum og pilkum eftir japanskari fyrimynd. Úrslitið var vánaligt til vinnuligt endamál, men teir mettu, at tað ikki var so lítið til av høgguslokki, sum teirra úrslit við pilkaveiðu vístu. Teirra niðurstøða var viðvíkjandi viðgerðini, at høgguslokkurin skuldi frystast beinan vegin. Annars vitstu teir at greiða frá, at japanarar ísaðu høgguslokk upp til tríggjar dagar. Ísingarhátturin var tann, at teir nýttu kassar, ís undir, so folie, eitt lag av høgguslokki, so aftur folie og ís. Hesin høgguslokkur var til matna.

Troling eftir høgguslokki er ókend her hjá okkum, og tað sindrið av royndum, ið vit hava gjørt, hevur ikki eydnast. Um ein slík roynd, sum hetta uppskot gongur út uppá, fer at eydnast, er óvist, eisini kann tað vera ein meinbogi at fáa høgguslokkin frystan nóg feskan, men um so er at munandi nøgdir av høgguslokki eru á havøki okkara, so mugu vit læra at fiska og viðgera henda fisk, so vit samfelagsliga fáa sum frægast burturúr, bæði til agn og møguliga framleiðslu til matna, og hesar byrjunnarroyndir føra kostnað við sær.

Høgguslokkafiskiskapur og viðgerð av høgguslokki eru fyrr havd fyri her á tingi. Í fjør viðgjørdi fiskivinnunevndin løgtingsmál nr. 32/1981 og tá samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum saman við avvarðandi stovnum, ráðum og vinnulívsmonnum at leggja fyri tingið so skjótt til bar og ikki seinri enn 1. november 1982 miðvísa ætlan, hvussu fisking, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað.

Eisini var til viðgerðar løgtingsmál nr. 58/1981, sum snúði seg um agn, og var til ummælis í fiskivinnunevndini. Hetta málið fall, men í viðmerkingunum í álitinum frá fíggjarnevndini tilskilar ein meiriluti, at teir ásanna, at tørvur er á eini størri frystigoymslu, og heita á landsstýrið um at arbeiða víðari við spurninginum og finna eina loysn.

Landsstýrið arbeiðir sostatt alsamt við hesum spurningum. Eisini kann vísast á, at fingin er til vega agnstudningur uppá kr. 2,25 pr. kg fyri at gera agn bíligari hjá teimum, sum egna tað. Um tað er rætt at áleggja landsstýrinum eina so bundna uppgávu, sum uppskotið bendir á, uppá so stutt skotbrá, er kanska ivasamt, men er tað nakar møguleiki at fiska og viðgera høgguslokk til agn fyri ein rímiligan kostnað, eigur hetta at vera roynt so skjótt til ber.

Nevndin metir, at tær royndir, ið skulu verða gjørdar, skulu verða nágreiniliga fyrireikaðar og útintar (tí tá er betri onga roynd at gera

enn eina vánaligt fyrireikaða).

Út frá omanfyri standandi viðmerkingum setir fiskivinnunevndin í staðin fyri uppskotið frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at skipa fyri praktiskum trolroyndum eftir høgguslokki til agn beinan vegin. Kostnaðurin verður at gjalda úr landskassanum.

2. viðgerð 17. september 1982.

Uppskotið til samtyktar frá fiskivinnunevndini varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

---

# 15. Avmarking av nýtsluni av píkadekkum

Ár 1982, mánadagin 13. september legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot I**
**til**

| **løgtingslóg um gjald fyri nýtslu av píkadekkum.** | **lagtingslov om afgift for brug af pigdæk.** |
|---|---|
| **§ 1.** Við góðkenning fíggjarnevndarinnar fær landsstýrið heimild at áseta, at gjald skal latast av skrásetingarskyldugum akførum, ið nýta píkadekk. | **§ 1.** Landsstyret kan med finansudvalgets godkendelse fastsætte, at en afgift skal betales af registerpligtige køretøjer, der bruger pigdæk. |
| *2. stk.* Gjaldið verður eftir nærri | *Stk. 2.* Afgiften fordeles mellem |

ásettum reglum býtt millum landskassan og kommunurnar.

§2. Landsstýrið kann áseta reglur um, at akfør, ið nýta píkadekk, skulu hava eitt merki ella tílíkt sum prógv fyri, at gjaldið er goldið, og politivaldið/bileftirlitið kann taka nummarspjøldrini av, um so er, at akfarið ikki hevur hetta prógvmerkið. Landsstýrið ásetir reglur um, hvussu merkini skulu síggja út, útflýggjan, hvar tey skulu setast, og nýtslu.

§3. Gjaldið kann innheintast við panting.

§4. Verður akfarið nýtt, uttan at gjaldið er goldið, kann tann gjaldskyldugi koma undir bót.

§5. Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1983.

landskassen og kommunerne efter nærmere fastsatte regler.

§2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at køretøjer, der bruger pigdæk, skal være forsynet med et mærke eller lignende til dokumentation for, at afgiften er betalt, og at køretøjets nummerplader kan fjernes af politiet/biltilsynet, såfremt køretøjet ikke er forsynet med denne dokumentation. Landsstyret fastsætter bestemmelser om mærkernes udseende, udlevering og benyttelse.

§3. Afgiften kan inddrives ved udpantning.

§4. Benyttes køretøjet, uden at afgiften er betalt, kan der pålægges den afgiftspligtige en bøde.

§5. Denne lov træder i kraft 1. maj 1983.

## Uppskot II
## til

## løgtingslóg um broyting í ferðslulógini.

§1. Í ferðslulógini, smbr. lógarkunngerð nr. 10 frá 18. mars 1966 við seinni broytingum, verður í §30[a], stk. 1, nr. 2

## lagtingslov om ændring i færdselsloven.

§1. I færdselsloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966 med senere ændringer, foretages i §30[a], stk. 1, nr. 2

skoytt uppí: »og um akfarið nýtir píkadekk, 60 km/t.«

2 følgende tilføjelse: »og om køretøjet bruger pigdæk, 60 km/t«.

§2. Henda lóg kemur í gildi 16. oktober 1982.

§2. Denne lov træder i kraft 16. oktober 1982.

**Viðmerkingar:**

Eftir kunngerð nr. 69 frá 13. november 1976 er loyvt at nýta píkadekk í vetrarhálvárinum frá 16. oktober til 30. apríl.

Spurningurin um tann skaða, ið píkadekkini gera, hevur verið frammi í fleiri ár.

Landsstýrið heitti í seinasta vetur á landsverkfrøðingin og bileftirlitið um at gera koyritekniskar royndir í ymsum veðurlíkindum við píkadekkum, øðrum dekkum, ið framleidd eru til koyring í hálku, og koyring við ketum.

Tann 23. august í ár hevur landsstýrið fingið hjáløgdu frágreiðing um koyriteknisku royndirnar.

Eftir fyriliggjandi lógaruppskoti fær landsstýrið heimild til við góðkenning fíggjarnevndarinnar at áseta eykagjald fyri bilar, sum koyra við píkadekkum.

Ætlanin er at seta gjaldið fyri hvørt vetrarhálvárið til 600 kr. fyri persónvognar og 400 kr. fyri hýruvognar og onnur akfør til vinnuligt endamál, meðan akfør yvir 3.500 kg totalvekt einki eykagjald skulu lata, t.v.s. lastvognar og størri bussar.

Um 2/3 av akførunum undir 3.500 kg framvegis fara at nýta píkadekk, verður inntøkan umleið 4,5 mió.kr., sum ætlanin er at býta við helvt millum landskassan og kommununrnar, og soleiðis at kommunanna partur verður býttur millum tær í mun til bilatalið í teimum einstøku kommununum. Skotið verður upp, at lógin ikki verður galdandi fyrrenn frá 1. mai 1983.

Samstundis verður skotið upp at lækka mest loyvdu ferð millum bygdir frá 80 km/t niður í 60 km/t fyri akfør við píkadekkum, tá hetta eisini vil minka munandi um slitið av vegunum umframt at økja um ferðslutrygdina, tá bilar við píkadekkum hava minni bremsievni á turrum vegi enn bilar við píkaleysum dekkum. Skotið verður upp, at henda broyting fær gildi frá 16. oktober 1983, t.v.s. fyri koyring við píkadekkum í vetur.

Uppskotini hava verið løgd fyri serligu ferðslunevndina hjá landsstýrinum, sum tekur undir við teimum.

*Sí skjal 4*

1. viðgerð 13. september. Málið varð beint í lóganevndina, sum 17. í s.m. legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 16. september 1982 og við 1. viðgerð 15. í sama mánaði beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild at áleggja eitt gjald á akfør, ið nýta píkadekk. Ætlanin er at seta gjaldið til 600 kr. árliga fyri privatakfør og 400 kr. árliga fyri akfør til vinnuligt endamál, meðan akfør yvir 3.500 kg totalvekt einki gjald skulu rinda. Samstundis verður skotið upp at broyta ferðslulógina soleiðis, at mesta ferð fyri akfør við píkadekkum verður sett niður frá 80 til 60 km/t. Mett verður, at hetta minkar um vegslitið, samstundis sum hetta eisini økir um ferðslutryggleikan.

Nevndin hevur viðgjørt málið, men kann eingin meiriluti í nevndini taka undir við uppskotinum frá landsstýrinum. Nevndin er tó samd um, at píkadekk eiga at verða avtikin, tá funnið verður fram til nakað betri. Royndirnar hjá landsverkfrøðinginum og bileftirlitinum eiga tí at halda fram og strekkja seg yvir eitt longri tíðarskeið, samstundis sum tær fara fram í øllum landinum.

Vísandi hertil setir ein samd nevnd fram fylgjandi uppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins:

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Koyriteknisku royndirnar halda fram yvir eitt longri tíðarskeið og fara fram í øllum landinum. Um kanningarnar vísa, at trygdin ikki krevur píkadekk, kann landsstýrið við kunngerð seta forboð móti nýtslu av píkadekkum.

2. viðgerð 17. sept. Uppskot landsstýrisins I, § 1 fall við 9-0 og II, § 1 fall við 9-0. Uppskotið frá nevndini samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 514-5-13

# 16. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1982, hósdagin 16. september legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða hesar broytingar:

*1)* Í § 19 verður 6. stk. orðað soleiðis:

Er í teim her nevndu førum ein ætlað komandi inntøka fyribils nýtt sum grundarlag undir álíkningini, verður við skattaárs enda álíkningin javnað eftir teim upplýsingum, sum tá eru til taks um veruligu inntøkuna eftir frammanfyri ávistu reglum roknað eftir einari ársinntøku. Her skal tá tann útroknaða ársinntøkan minkast við einum prosenttali, ið er ájavnt við prístalsvøksturin í tí álmanakkaári, sum er beint frammanundan skattaárinum. Líkningarráð Føroya kunnger við árslok nevndu

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskatt og kommuneskat.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

*1)* I § 19 får stk. 6 følgende ordlyd:

Såfremt i de forannævnte tilfælde en anslået fremtidig indtægt foreløbig skal lægges til grund ved ansættelsen, foretages efter skatteårets udløb regulering af ansættelsen på grundlag af de da foreliggende oplysninger om den virkelige indkomst beregnet til et års indkomst efter foran givne regler. I så fald skal den udregnede årsindkomst nedsættes med et procenttal, der modsvarer prístalsstigningen i det kalenderår, der ligger forud for skatteåret. Likningarráð Føroya bekendtgør ved

prosentupphædd rundað av til nærmasta heila prosenttal.

§2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1982/83.

årets afslutning omtalte procenttal, afrundet til nærmeste hele procenttal.

§2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1982/83.

**Viðmerkingar:**
Persónar, sum við flyting til Føroya koma undir tær her galdandi reglur fyri skatting av tilflytarum, koma fyrsta skattaárið og í ávísum førum eisini annað skattaárið undir skatt av samtíðarinntøku, t.v.s. hesir persónar fáa ikki tann fyrimun, sum tað er fyri fastbúgvandi í Føroyum, at skatturin í einum ávísum skattaári verður líknaður eftir inntøkuni í farna álmanakkaári, sum vanliga er prísvøksturin minni. Fyri at bøta um hesi viðurskifti og harvið javnstilla tilflytaran við tann fastbúgvandi, verður skotið upp at minka ta uppgjørdu ársinntøkuna hjá tilflytaranum við prísvøkstrinum í undanfarna álmanakkaári.

Fyri skattaárið 1982/83 verður tann í hesi lóg nevndi prístalsvøkstur 14%.

1. viðgerð 17. september. Málið varð beint í skattanevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fyri tingið av landsstýrinum tann 16. í hesum og varð undir 1. viðgerð tann 17. í hesum beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur havt fund í dag, og ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð á seinni fundi sama dag. §1 samtykt við 27-0 og §2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 430-12-36 Lóg nr. 101 frá 30. sept. 1982

# 17. Veðhald fyri láni til SEV

Ár 1982, hósdagin 16 september legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til SEV.**

**§1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til Elfelagið SEV upp á SDR. 4.100.000.

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til SEV.**

**§1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et udenlandslån til Elselskabet SEV på SDR. 4.100.000.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Elfelagið SEV hevur við skrivi frá 30. august 1982 søkt um veðhald fyri láni, stórt uml. kr. 38.000.000,- til partvísa fíggjan av útbyggingini av elverkinum á Sundi.

Nordiska Investeringsbanken hevur givið elfelagnum tilboð um lán, stórt SDR 4.100.000, svarandi til umleið 38 mió. kr. Lánstíðin er 15 ár, og rentan er føst 13,4% p.a.

Viðløgd fylgja skjøl frá SEV viðvíkjandi upptiknum lánum og fíggjan av útbyggingini av elverkinum á Sundi.

1. viðgerð 17. september. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. september 1982 og undir 1. viðgerð tann 17. september beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur á fundi tann 17. september viðgjørt málið, og hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Øssur Dam Jacobsen) tilskilar, at tá málið var lagt fram 16. september og beint í fíggjarnevndina tann 17. september og skal avgreiðast longu sama dag, verður ikki møguligt at viðgera málið gjølla, og verður tí støða tikin í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Ein triði minniluti (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. sept. 1982.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1205-21 Lóg nr. 102 frá 30. sept. 1982

---

# 18. Broyting í løgtingslóg um fiskavraking

Ár 1982, hósdagin 16. september legði Petur Reinert, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fiskavraking.**

§1. Í løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 um fiskavraking gongur §7 út, og sum nýggj §7 verður sett:

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskevragning.**

§1. I lagtingslov nr. 12 af 12. januar 1950 om fiskevragning udgår §7, og som ny §7 indsættes:

»§7. Løn vrakara og góðsumetara fyri arbeiði teirra við vraking og góðskumetan verður goldin frá Lønjavningargrunninum eftir tímaseðlum, sum verða sendir Lønjavningargrunninum hvørja viku, og sum tann, sum vrakað ella góðskumett er fyri, sendir.

*2. stk.* Tann ella teir, sum keypa ráfisk, verða at gjalda ávísa peningaupphædd fyri kilo av feskum fiski til Lønjavningargrunnin, útroknað eftir FI-seðlunum — sum endurgjald fyri vraking og góðskumetan.

*3. stk.* Álagt verður vrakieftirlitsstovninum at geva vrakarum og góðskumetarum holla undirvísing í starvi teirra.

*4. stk.* Vrakarar og góðskumetarar eiga ikki bert at arbeiða í heimbygd síni, men skulu skifta við aðrar eftir ávísum reglum.«

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

»§7. Vrageres og kvalitetskontrollørers løn for deres arbejde med vragning og kvalitetskontrol betales af Lønjavningargrunnin efter timesedler, som bliver tilsendt Lønjavningargrunnin hver uge af den, som har foranlediget vragningen eller kvalitetskontrollen.

*Stk. 2.* Den eller de, som køber fersk fisk, skal betale et fastsat beløb pr. kg råfisk til Lønjavningargrunnin, beløbet udregnes på basis af FI-sedlerne som betaling for vragning eller kvalitetskontrol.

*Stk. 3.* Vragerkontrolinstitutionen er forpligtet til at give vragere og kvalitetskontrollører en grundig undervisning i deres arbejde.

*Stk. 4.* Vragere og kvalitetskontrollører bør ikke kun arbejde i egen hjembygd, men skal efter faste regler turnere med andre.«

§2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Tað hevur altíð hildið vera ein meginregla, at tann, sum skuldi vraka fisk, átti at vera fíggjarliga óheftur av honum ella teimum, sum hann skuldi meta fiskin frá ella til.

Áður hevur kanska av góðum orsøkum ikki verið hugsað so nógv um feskan fisk — um vrakan og góðskumetan av feskum fiski upp úr skipi yvir vektina inn á fiskavirkini. Men í dag er hetta sera týðandi táttur, sum hevur nógv at siga fíggjarliga bæði fyri tann, sum av ræður

feskan fisk, og eisini fyri hann, sum skal tilvirka hann, at góðskumetanin og vrakingin er so eins sum gjørligt yvir alt landið og liggur so nær uppat teimum skrivaðu reglunum og prisunum frá nevndini fyri ráfiskagrunninum sum gjørligt. Størri frávik frá hesum reglum kunnu fáa stóran fíggjarligan týdning og miss bæði fyri hann, ið selur, og fyri hann, ið keypir.

Ikki er óvanligt, at menn halda seg hava havt miss, tí vrakingin ella góðskumetanin hevur antin verið ov hørð ella ov lin, og ikki er altíð lætt at vera hann, sum hetta arbeiði skal gera.

Tað má tí vera rættast, at hesir menn, sum gera hetta arbeiðið, verða fíggjarliga óheftir bæði av keypara og seljara, og at teir ikki eru ov nógv heftir at síni heimbygd.

Sum er verða bæði vrakarar og góðskumetarar løntir av fiskavirkjunum, meðan vrakieftirlitsmenn verða løntir av tí almenna.

Rættast má verða, at eisini vrakarar og góðskumetarar verða løntir frá tí almenna, t.d. lønjavningargrunninum.

Hetta gerst á tann hátt, at virkini senda tímaseðlarnar inn til lønjavningargrunnin, sum síðani lønar hesum monnum.

Ikki nýtist hetta at kosta tí almenna eitt oyra, tí hóskandi upphædd — mett verður millum 5 og 10 oyru — kann verða løgd upp á hvørt kilo av ráfiski, sum fiskavirkini verða kravd eftir, tá F1-seðlarnir eru innlatnir.

Í vár viðtók tingið við 30 atkvøðum fylgjandi uppskot til samtyktar:

»Heitt verður á landsstýrið um at skipa soleiðis fyri, at vit fáa eina javna góðskumeting kring landið, og at endurskoða lóggávuna viðvíkjandi vraking av øllum fiski og fiskaúrdráttum.«

Einki røkist fyri, at nakað um hetta kemur frá landsstýrinum, og tí setir Tjóðveldisflokkurin hetta fram sum fyrstu og avgjørt bráðneyðugu broyting í hesum týdningarmikla máli.

1. viðgerð 17. september. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 6. mai 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt av tjóðveldisflokkinum 16. september 1982 og við 1. viðgerð 17. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frederik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Juul Jacobsen og Jógvan Olsen) førir fram:

Seinastu tingsetu viðgjørdi fiskivinnunevndin løgtingsmál nr. 33/1981: Góðskumetingarkærustovnur, sum var framlagt av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki.

Í hesum sambandi varð eitt uppskot til samtyktar samtykt við 30-0 atkvøðum, ið var soljóðandi:

»Heitt verður á landsstýrið um at skipa soleiðis fyri, at vit fáa eina javna góðskumeting kring landið, og at endurskoða lóggávuna viðvíkjandi vraking av øllum fiski og fiskaúrdráttum.«

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við fiskimálaráðharran um hetta mál, og sigur hann, at landsstýrið fer nú at taka stig til at endurskoða vrakaralógina sum heild, her uppi í eisini lønarviðurskiftini hjá vrakarum og góðskumetarum. Tá so er, metir meirilutin, at tað er óneyðugt at taka henda partin burturúr til viðgerðar nú fyri seg sjálvan, men eigur heldur at vera bíðað, til landsstýrið kemur við eini endurskoðan av allari lógini, og setir einki uppskot fram, men vísir annars til viðmerkingar og uppskot frá nevndini í løgtingsmáli nr. 37/1982.

Ein minniluti (Hans M. Joensen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Tórálvur Mohr Olsen) tekur undir við uppskotinum, tó við fylgjandi broyting. I staðin fyri núverandi 2. stk. í § 1 verður sett sum nýtt 2. stk.:

»2. *stk.* Tær lønir, ið verða goldnar úr Lønjavningargrunninum eftir teimum í 1. stk. nevndu tímaseðlum, verða endurgoldnar úr Ráfiskagrunninum.«

Viðmerkingar til 2. stk.:

Umsitingarliga er tað meira praktiskt og einfaldari, at peningurin verður endurgoldin úr ráfiskagrunninum, heldur enn at fiskakeyparar endurgjalda hendan pening.

Ráfiskagrunnurin fær hendan pening aftur í uppgerðini millum grunnin og fiskakeyparan.

2. viðgerð 9. mai, atkvøðugreiðsla 10. mai. Uppskotið frá Petur Reinert fall við 14-0. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Tórálvi Mohr Olsen) til § 1 fall við 13-0.

# 19. Veiting av ríkisborgararætti

Ár 1982, fríggjadagin 17. september legði lóganevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur 13. september 1981 skrivað tinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 4 frá 11. november 1981, lóg nr. 1 frá 10. februar 1982 og lóg nr. 3 frá 18. mai 1982, allar um veiting av ríkisborgararætti, verða lýstar at galda í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.«

Málið varð beint í lóganevndina, sum hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Edmund í Garði, Jákup Lindenskov og Agnar Nielsen) setir fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóg nr. 4 frá 11. november 1981, lóg nr. 1 frá 10. februar 1982 og lóg nr. 3 frá 18. mai 1982, allar um veiting av ríkisborgararætti, verða lýstar at galda í Føroyum.

Minnilutin (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 17. sept. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 508-3

# 20. Ríkislóg um »Statens Uddannelsesstøtte«

Ár 1982, fríggjadagin 17. september legði lóganevndin fram soljóðandi

## Álit

Landsstýrið hevur tann 9. september 1982 skrivað tinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 291 frá 9. juni 1982 um broyting av lóg um »Statens Uddannelsesstøtte« og lóg nr. 292 frá 9. juni 1982 um »gældsanering af statsgaranterede studielån« verða lýstar at galda í Føroyum eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 um kunngerðing av lógum og fyriskipanum í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.«

Stuðul til tey, sum eru undir útbúgving, verður veittur sum studningur og/ella bankalán við statsábyrgd. Fyri at lætta um skuldabyrðina verður eftir lóg nr. 292 frá 9. juni 1982 møguleiki fyri, umframt lán við statsveðhaldi, at veita beinleiðis lán úr ríkiskassanum við bíligari rentu. Eftir lóg nr. 292 frá 9. juni 1982 verður veittur rentustuðul fyri at lætta um afturgjaldingarmøguleikarnar hjá teimum, ið hava tikið stór lán úr bankum ella sparikassum við statsábyrgd.

Lóganevndin hevur viðgjørt málið, og setir ein samd nevnd fram fylgjandi

## Uppskot til samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 291 frá 9. juni 1982 um broyting av lóg um »Statens Uddannelsesstøtte« og lóg nr. 292 frá 9. juni 1982 um »gældsanering af statsgaranterede studielån« verða lýstar at galda í Føroyum.

Nevndin ger vart við teir skeivleikar, ið ofta erú innan býtið av

stuðuli orsakað av, at peningurin ikki verður umsitin her heima, og at grundarlagið er skattskylduga inntøkan. Fyri at fáa broytt hesi óhepnu býtisviðurskifti, mælir lóganevndin til, at orðingin í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978, §11, stk. 3 í broyttum líki verður nýtt, tá skattamyndugleikar uppgeva skattskyldugu inntøkuna.

2. viðg. 17. september. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2116-1-1

---

# 21. Broytingar í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini

Ár 1982, fríggjadagin 17. september legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri Fólkatingið uppskot til »Lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg« og »Lov om ændring af lov for Færøerne om børneforsorg«, sum vóru viðløgd í løgtingsmáli nr. 12/1982.

**Viðmerkingar:**

Endamálið við broytingunum er at forða fyri, at livikorini hjá eini familju, sum verður rakt av sjúku, arbeiðsloysi ella øðrum, ikki gerast munandi verri frá einum degi til annan. Størsta broytingin í uppskotinum er, at hjálpin eftir §9 verður hækkað rættiliga munandi, og at arbeiðsinntøkan hjá einum hjúnafelaga ikki framyvir verður mótroknað í forsorgarhjálpini hjá hinum hjúnafelaganum. Sambært §9, stk. 2 verður minsta hjálpin á hædd við fólkapensjónina við

møguligari barnaviðbót og hægsta hjálpin á hædd við hægsta sjúkradagpening. Hetta vil siga, at hjálpin, tá talan er um ein forsyrgjara, kemur at liggja úr 4.226 kr. upp í 7.060 kr. um mánaðin, alt eftir hvussu stórar skyldur móttakarin av hjálpini hevur. Sambært stk. 3 í somu § kunnu persónar, ið hava serliga stórar skyldur og serliga stórar útreiðslur til býli, eisini fáa hjálp út yvir tað, sum er nevnt í stk. 2. Við øðrum orðum kann hjálpin í summum førum verða størri enn hægsti sjúkradagpeningur.

Hjá hjúnum hevur støðan verið tann, at er annar hjúnafelagin komin undir forsorgarhjálp, meðan hin framvegis hevur havt lønarinntøku, so hevur lønarinntøkan hjá øðrum hjúnafelagnum verið mótroknað uppihaldshjálpini hjá hinum, ofta við tí úrsliti, at ongin króna kom til útgjaldingar. Sambært uppskotinum verður hetta broytt. Vísir tað seg, at ein persónur, sum fær fyribilshjálp, møguliga hægsta sjúkradagpening ella meira, ikki kann koma aftur í vinnu, skal hann í longdini niður á fólkapensjónsupphæddina við møguligari barnaviðbót. Í slíkum førum skal almannaumsitingin veita hjálp og vegleiðing soleiðis, at hann kann fáa størri fastar útreiðslur av vegnum ella munandi niðursettar, við tí fyri eyga, at persónurin ella familjan kann liva av tí varandi hjálpini.

Eftir at hesi uppskotini vóru løgd fram næstseinasta hósdag, hevur pressan umrøtt tær broytingar, sum eru í báðum uppskotunum. Fleiri hava helst fingið ta fatan, at tá talan er um hjálp til arbeiðsleys, so eru nakrar heilt nýggjar reglur um hetta settar inn í lógina um almenna forsorg. Men hetta er skeiv fatan. Sum er, kunnu arbeiðsleys fáa hjálp eftir forsorgarlógini á jøvnum føti við tey, sum eru í trongstøðu av øðrum grundum. Tey framstigini, sum broytingarnar eftir uppskotinum føra við sær, koma øllum til góðar í eins stóran mun og tað uttan mun til, um orsøkin til trongstøðuna er arbeiðsloysi, sjúka ella okkurt annað. Sostatt innihalda broytingarnar onki, ið er serstakliga nýtt, tá talan er um fólk, sum eru í trongstøðu orsakað av arbeiðsloysi.

1. viðgerð 17. sept. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 6. december legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 17. september 1982 beint í sosialu nevndina.

Undir nevndarviðgerðini hevur sosiala nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) er vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við málinum, og setir tí fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingsmál nr. 21/1982 verður sent landsstýrinum til víðari viðgerð.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) átalar, at landsstýrið hevur drálað so leingi við at fáa fraint tiltrongdar broytingar í forsorgarlógini og í barnaforsorgarlógini.

Hetta drál hevur ført við sær, at veitingarupphæddirnar als ikki røkka til livsins uppihald hjá teimum, sum fáa forsorgarhjálp eftir greinunum 9, 15 og 22.

Sum dømi kann verða víst á, at eini hjún í dag, sum fáa hjálp eftir §9, í mesta lagi kunnu fáa útgoldnar um mánaðin kr. 4.436,- + 500 kr. fyri hvørt barnið, meðan støk í mesta lagi fáa 2.942 kr. um mánaðin.

Hetta dømi vísir, at eingin kann klára seg við hesari hjálp uttan at koma í fíggjarligt óføri, og er tað tí landsstýrisins ábyrgd, at nógv fólk eru komin í skattaeftirstøðu og ikki fáa rindað rentur og avdráttir.

Í seinastuni hevur tikið seg upp arbeiðsloysi víða hvar í landinum. Tann einasti møguleiki, tey arbeiðsleysu hava fyri at fáa peningaligan stuðul, er hjálp eftir §9 í forsorgarlógini, ein hjálp, ið, sum ávíst, ikki røkkur til allar vanligar útreiðslur.

Tað er tí umráðandi, at tað ikki verður drálað longur við at seta tær broytingar í gildi, sum uppskotið umfatar, og mælir minnilutin tí løgtinginum til at samtykkja uppskot javnaðarfloksins, sum er sama uppskot, sum á sinni varð framlagt av landsstýrinum og síðan tikið aftur.

Minnilutin mælir annars til, at bæði forsorgarlóg og barnaforsorgarlóg verða endurskoðaðar, so tær betur hóska við føroysk viðurskifti.

Í hesum sambandi kann verða víst til, at í Danmark eru hesar lógir langt síðani broyttar.

Nógv tilfar er til taks um hesi viðurskifti, eitt nú frá arbeiðsbólkum, sum virkaðu í ST-barnaárinum og í ári teirra brekaðu.

Eisini eigur at verða hugsað um, at tað framvegis ongar reglugerðir eru til hesar lógir.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Upskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið setir eina nevnd við 5 limum við fólki úr umsitingini hjá landi og kommunum at endurskoða forsorgarlógina og barnaforsorgarlógina í samráð við avvarðandi myndugleikar, herundir donsku-føroysku sosialu nevndina, brúkarar og barnaverndarnevndir við tí fyri eyga at gera uppskot til lógir, ið hóska til okkara viðurskifti við tørvandi reglugerðum, so ikki er ivi um, hvussu lógirnar skulu tulkast.

2. viðgerð 16. december. Atkvøðugreiðsla 17. december. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum. Uppskotið frá meiriluta í sosialu nevndini fall við 13-0 og frá minnilutanum fall við 14-0 atkvøðum.

---

# 22. Flutningssambandið við smáplássini

Ár 1983, fríggjadagin 17. september løgdu Svend Aage Ellefsen og Anfinn Kallsberg, løgtingsmenn, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at syrgja fyri, at allar bygdir í Føroyum hava fast flutningssamband við meginøkið í minsta lagi eina ferð um vikuna. Um veður ella aðrar orsøkir forða fyri sambandi eftir landi ella sjógvi, verður landsstýrinum heimilað um neyðugt at leiga helikoptaran hjá donsku vaktartænastuni til endamálið, um ikki annar helikoptari er tøkur. Flutningsútreiðslurnar verða at taka av konto Strandferðslunnar.

**Viðmerkingar:**
Nógvar smábygdir í Føroyum eru sera illa fyri, hvat sambandi við størru bygdirnar viðvíkir.

Vesturi í Vágum t.d. hevur bygdin Gásadalur als einki skipað samband, eins og Mykines vanliga fleiri mánaðir um vetrarhálvuna er uttan samband við umhvørvið.

Um útplássini í Norðoyggjunum eins og nógv onnur smápláss kann sama søgan sigast.

Nógv hevur verið tosað og skrivað um, at einhvør bati eigur at verða gjørdur á hesi viðurskifti — tó kortini higartil alt nærmast til fánýtis. Tann væleydnaða royndarflúgvingin við Tyrlu seinasta ár hevur higartil bert enn meira klárliga víst fhúgvunum á hesum plássum, hvussu nógv verri tey eru fyri enn aðrir borgarar her á landi.

Hóast avvarðandi landsstýrismaðurin íðin hevur virkað við at finna varandi loysn á helikoptaramálinum, er enn einki ítøkiligt úrslit. — Vónandi sæst hetta skjótt. Av tí at undirritaðu tingmenn ikki longur kunnu lata hesi viðurskifti halda fram óbroytt, verður soljóðandi uppskot til samtyktar lagt fyri løgtingið.

1. viðgerð 10. november 1982. Aftaná atkvøðugreiðslur um at beina málið ávikavist í eina bygdamenningarnevnd og landsstýrið, sum fullu við ávikavist 11 og 12 atkvøðum, varð samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

8. mars varð málið afturtikið.

---

# 23. Prístalsviðgerð av lærlingalønum

Ár 1982, fríggjadagin 17. september legði lóganevndin fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og beint í lóganevndina. Tann 24. apríl 1982 samtykti løgtingið, at málið skuldi útsetast til Ólavsøkutingsetuna og viðgerast í lóganevndini áðrenn.

Eftir uppskoti landsstýrisins verður mælt til at broyta lærlingalógina soleiðis, at lærlingalønir verða ásettar av yrkisfeløgunum ella víðkaða læruráðnum, og at lærlingalønir verða prístalsviðgjørdar eftir løgtingslógini um prístalsviðgerð av arbeiðslønum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og kann taka undir við uppskoti landsstýrisins um nevndu broyting av lærlingalógini, sum nevndin heldur, at landsstýrið eigur at fyrireika at leggja fram.

Sostatt setir nevndin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fram lógaruppskot um broyting í lærlingalógini samsvarandi álitinum.

2. viðgerð 17. september. Aftan á at skotið var upp at beina málið aftur í nevnd, fór atkvøðugreiðsla fram, um viðgerðin kundi halda fram. Hetta varð samtykt við 19-0 atkvøður.

Uppskotið frá nevndini varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1300-6-3

---

# 24. Løgtingslóg um hýruvognskoyring

Ár 1982, fríggjadagin 17. september legði lóganevndin fram soljóðandi

## Uppskot til løgtingslóg um hýruvognskoyring.

§1. Landsstýrið kann gera eina standard hýruvognsreglugerð, sum eftir ynski frá einum ella fleiri kommunum kann setast í gildi har við ella uttan broytingum.

§2. Sum hýruvognur er at skilja motorakfar, góðkent og innrættað til flutning av í mesta lagi 9 persónum, førarin viðroknaður, og sum ikki einans verður nýtt til sjúkraflutning ella vanliga rutukoyring, smbr. §1 í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.

§3. Í hýruvognsreglugerð kunnu ásetast reglur um innrætting, útgerð, nýtslu, gjøld, hýruvognsstøðir og tal av hýruvognum v.m.

§4. Brot á reglurnar í góðkendari hýruvognsreglugerð ella treytirnar í loyvi til hýruvognskoyring koma undir bót. Er brotið framt av einum felag ella tílíkum, kann felagið koma undir bót.

§5. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

*Stk. 2.* §62 í ferðslulógini er ikki galdandi í kommunum við góðkendari hýruvognsreglu-

## Lagtingslov om hyrekørsel.

§1. Landsstyret kan udfærdige en standard hyrevognsregulativ, som efter en eller flere kommuners ønske kan sættes i kraft der med eller uden ændringer.

§2. Ved hyrevogn forstås motorkøretøj, der er godkendt og indrettet til befordring af indtil 9 personer, føreren medregnet, og som ikke udelukkende anvendes til sygetransport eller almindelig rutekørsel, jfr. §1 i lagtingslov om person- og godsbefordring.

§3. I hyrevognsregulativ kan fastsættes bestemmelser om indretning, udstyr, brug, takster, hyrevognsstationer og antal af hyrevogne m.v.

§4. Overtrædelse af bestemmelserne i et godkendt hyrevognsregulativ eller i betingelserne i tilladelser til hyrevognskørsel straffes med bøde. Er overtrædelsen begået af et selskab eller lignende, kan der pålægges selskabet bøde.

§5. Denne lov træder i kraft straks.

*Stk. 2.* §62 i færdselsloven er ikke gældende i kommuner med godkendt hyrevognsregulativ.

gerð.

*Stk. 3.* Vinnubrøv, sum nýtt eru til hýruvognskoyring, áðrenn ein hýruvognsreglugerð verður sett í gildi í einari kommunu, verða framvegis í gildi. Hjá teimum, ið ikki hava havt hýruvognskoyring sum høvuðsvinnu, er vinnubrævið tó bert galdandi, til hýruvognurin verður útskiftur.

*Stk. 3.* Næringsbeviser, der er benyttet til hyrevognskørsel, før et hyrevognsregulativ er sat i kraft i en kommune, er fortsat gældende. Dog er næringsbeviset for den, som ikke har haft hyrevognskørsel som hovedbeskæftigelse, kun gældende, til vedkommende hyrevogn bliver udskiftet.

**Viðmerkingar:**
Uppskotið var framlagt av landsstýrinum í seinastu tingsetu, løgtingsmál nr. 105/1981 og við 1. viðgerð beint í lóganevndina. Undir viðgerðini handaði Aksturvinnufelagið Samfylking, Tórshavn, nevndini eitt nýtt uppskot til hýruvognslóg, og tá hetta uppskot víkti so nógv frá uppskoti landsstýrisins, helt nevndin seg ikki kunna avgreiða málið í seinastu tingsetu. Løgtingið samtykti tí, at viðgerðin skuldi halda fram í lóganevndini sum millumtinganevnd.

Eftir uppskoti landsstýrisins verður biðið um heimild til at gera eina standard hýruvognsreglugerð, sum eftir ynski frá eini ella fleiri kommunum kann setast í gildi har við ella uttan broytingum.

Broytingaruppskotið frá Aksturvinnufelagnum viðvíkti mest innihaldinum í einari komandi reglugerð. Nevndin roknar við, at felagið og kommunurnar fáa høvi til at gera sína ávirkan á ætlaðu standard reglugerðina, áðrenn landsstýrið lýsir hesa.

Fyri at fyribyrgja, at ov nógvir fáa sær hýruvogn sum hjávinnu, áðrenn ein hýruvognsreglugerð verður sett í gildi í einari kommunu, hevur nevndin broytt uppskot landsstýrisins § 5, stk. 3, soleiðis at teir, ið ikki hava hýruvognskoyring sum høvuðsvinnu, bert hava rætt at halda fram, til hýruvognurin verður útskiftur. Annars verður uppskot landsstýrisins endurnýggjað óbroytt.

2. viðgerð 17. september. § 1 samtykt við 28-0, §§ 2-5 samtyktar við 28-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 514-11-3

Lóg nr. 104 frá 19. okt. 1982

# 25. Landsstýrismál

Ár 1983, mánadagin 16. mai legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

## Álit

Landsstýrið hevur sent løgtinginum útskriftir úr gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið frá 30. juli 1981 til 2. juli 1982.

Málið varð beint til viðgerðar í landsstýrismálanevndini.

Landsstýrið hevur í hesum tíðarskeiði hildið umleið 75 fundir.

Landsstýrismálanevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Flemming Mikkelsen og Øssur Dam Jacobsen) tekur undir við avgerðum landsstýrisins og setir fram soljóðandi

## Uppskot til samtyktar

Løgtingið góðtekur tær avgerðir, sum landsstýrið hevur tikið sambært útskriftunum úr gerðabókini fyri tíðarskeiðið 30. juli 1981 til 26. juli 1982.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen) ger hesar viðmerkingar:

Útskriftirnar úr gerðabók landsstýrisins, sum fevnir um tíðarskeiðið frá 30. juli 1981 til 26. juli 1982, vísa, at ein heilt stórur partur av arbeiðstíð landsstýrisins er farin til at veita skipum, bátum og virkjum kreppuhjálp, veðhald og serlán. Sitandi landsstýri sigur seg vera liberalt sinnað, og fremst í skildri sínum hevur tað eitt privat vinnulív, sum er minst møguliga heft av tí almenna. Gerðabókin vísir, at landsstýrisins politikkur á hesum týðandi øki er fullkomiliga miseydnaður, tí vinnulívið hevur ongantíð havt brúk fyri so nógvari almennari hjálp sum júst nú.

Annars ger minnilutin hesar viðmerkingar til nøkur einstøk mál:

1) Undirgrundsmálið er eitt dømi um ta stóru ósemju, sum hevur rátt innan verandi samgongu. Hetta sæst m.a. av, at á fundi 8. juli 1982 varð lagt fram skriv frá løgtingsformanninum, har hann mótmælti, at løgmaður ikki hevði sent forsætisráðnum skriv frá samráðingarnevndini í undirgrundsmálinum.

2) Á fundi 10. september 1981 hevur landsstýrið samtykt at leggja uppskot fyri tingið um keyp av gomlu útvarpshúsunum á Bryggjubakka. Síðani eru húsini keypt, men málið hevur ongantíð verið fyri í tinginum.

3) Á fundi 13. oktober 1981 hevur landsstýrið góðkent eina fyribilsavtalu við danska útvarpið um sjónvarpssendingar, treytað av at teksting ikki verður roknað sum broyting í teimum einstøku programmunum.

Minnilutanum kunnugt stendur tó henda treyt við enn, t.v.s. at tað føroyska sjónvarpið hevur ikki rætt til at seta føroyskan tekst á sendingarnar.

4) Landsstýrið hevur á fundi 14. oktober 1981 sett ávísar treytir í sambandi við fíggingarhjálp til Global Chemical Tankers. Ein av treytunum er, at tann parturin av partapeninginum, sum verður lænt-ur, ikki kann veðtryggjast í skipinum ella felagnum. Tað tykist minnilutanum løgið, at landsstýrið góðtekur, at partapeningurin verður læntur, tí serliga leiðarin av núsitandi samgongu hevur lagt alstóran dent á, at partapeningur eigur altíð at vera reellur.

5) 19. november 1981 stendur at lesa í gerðabók landsstýrisins: »Umlegging av sýslunum, soleiðis at sýsluskrivstovurnar og politistøðirnar verða samanlagdar til eitt arbeiðspláss, og at leiðarastarvið verður sett við einum útbúnum politisti, sum framvegis verður nevndur sýslumaður. Sýsluskrivstovan í Fuglafirði verður flutt til politistøðina í Runavík, men avgreiðsla verður eisini í Fuglafirði 2 ferðir 2 tímar um vikuna. Sýsluskrivstovan í Sørvági verður flutt til politistøðina í Miðvági. Suðuroyggin verður løgd saman í eina sýslu, men avgreiðsla verður 2 ferðir 2 tímar um vikuna í Vági.«

Tað er ikki greitt, um landsstýrið hevur gjørt nakað meira við hetta mál.

6) Viðgerðin av spurninginum um at selja trolaran Nónhamar hevur verið rættiliga marghátlig. 30. desember 1981 kl. 17 helt landsstýrið fund, har »samtykt varð við fyrivarni av góðkenning fíggjarnevndarinnar at taka við boðnum frá p/f Norðstjørnuni undir stovnan um at keypa trolaran fyri 25,5 mió. kr., av hesum 2,5 mió. kr. kontant.«

Dagin eftir, 31. desember 1981, stendur í gerðabókini, at »áðrenn midnátt 30. december er komið tilboð frá Palla Rasmussen o.fl., Klaksvík, 26,1 milj. kr., herav kontant 10%«. Hetta boðið sostatt 600.000 kr. hægri enn tað fyrra, men nú tekur landsstýrið ikki av. Tað tykist løgið.

Á fundinum 31. december varð sambært gerðabókina »samtykt..., at trolarin verður seldur við auktión millum teir 5, ið givið hava boð

áðrenn midnáttina 30. december.« Minnilutin heldur tó ikki, at hetta varð samtykt, tí á fundinum vóru bert triggir limir av landsstýrinum, og ein teirra, Páll Vang, atkvøddi ikki fyri auktiónini. Bert løgmaður og Eilif Samuelsen atkvøddu fyri, t.v.s. bert tveir av fimm landsstýrislimum.

Seinni sæst annars í gerðabókini, og figgjarnevndin góðkendi ikki søluháttin; og landsstýrið er tí framvegis reiðari á Nónhamri.

7) Hetta landsstýrið segði seg vilja ansa eftir, at ikki ov nógv almenn størv vórðu sett, men kortini man tað ikki hava hent seg áður, at so nógv nýggj størv eru sett, sum júst undir hesum landsstýrinum. Tað tykir eisini minnilutanum løgið, tá landsstýrið á fundi 12. februar so gleivbeint setir so mong nýggj størv innan sjúkrahúsverkið, bert tí at nýggjur sáttmáli var gjørdur millum Amtrádsforeningen og Almindelig Dansk Lægeforening um arbeiðstíðina hjá hjálparlæknum, sjúkrasystrum og laborantum. Orsakað av hesum sáttmála góðkendi landsstýrið at seta 19 nýggj størv á teimum trimum sjúkrahúsunum, harav 8 læknastørv.

Eisini tykist tað løgið, at landsstýrið á fundi 2. apríl 1982 hevur góðkent sáttmála við Dansk Sygeplejeråd. So vítt minnilutanum kunnugt helt undanfarna samgonga fast við, at hon samráddist ikki við útlendsk fakfeløg. Landsstýrið átti at álagt starvsfólkinum innan heilsuverkið at skipa sítt egna fakfelag ella at tekna seg sum lim í onkrum verandi føroyskum fakfelag.

8) Undan seinasta vali fanst táverandi formaður Sambandsfloksins at landsverkfrøðinginum, tí at hann hevði keypt arbeiðstól uppá kreditt. Nú sæst í gerðabókini fyri 21. mai 1982, at landsstýrið hevur samtykt at góðkenna, at landsverkfrøðingurin skuldi keypa arbeiðsamboð í Svøríki fyri 2,5 milj. kr. við 3 ára kreditti. Lánini skuldu gjaldast aftur við peningi úr grunninum til berghol og brúgvar.

9) Á fundi 4. juni 1982 varð umrødd ein áheitan frá Vestmanna Fiskavirki um at yvirtaka Baader 234 linjurnar, sum landsstýrið hevði bílagt, og á fundi 24. juni sæst, at landsstýrið hevur samtykt at gjalda 1/3 á konto fyri 5 slíkar maskinur.

Minnilutin lysti vita, um landsstýrið hevur yvirtikið agenturið uppá Baader maskinur.

10) 13. mai 1982 samtykti landsstýrið at nokta stuðul til KFUM & K í Klaksvík, men 4. juni varð samtykt at veita 25% í studningi av 858.100 kr. til KFUM í Havn til uppíbygging og nýinnrætting av felagshúsinum.

Hetta eru bert nøkur fá dømi um tað óhepna arbeiðslagið í Tinganesi. Minnilutin heldur, at so nógvar avgerðir, sum landsstýrið hevur

tikið, eru skeivar, at tingið kann ikki góðkenna gerðabókina. Minnilutin setir tí eina uppskot fram.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 17-12 atkvøðum.

F.L.j.nr. 204-2

# 26. Landskassaveðhald til P/f Sølumiðstøð Útróðrarmanna

Ár 1982, mikudagin 10. november legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um landskassaveðhald til L/F Sølumiðstøð Útróðrarmanna**

**§1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri upp til 5 mió. kr. fyri rakstrarlán, sum L/F Sølumiðstøð Útróðrarmanna tekur í føroyskum bankum í sambandi við keyp av fiski frá føroyskum útróðrarbátum, viðgerð og útflutningi av hesum fiski.

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om landsgaranti til L/F Sølumiðstøð Útróðrarmanna**

**§1.** Landsstyret får hjemmel til på landskassens vegne at garantere for op til 5 mill. kr. for kassekredit, som L/F Sølumiðstøð Útróðrarmanna tager i færøske banker til køb af fisk fra færøske fiskekuttere, tilvirkning og eksport af denne fisk.

**§2.** Denne lov får gyldighed straks.

**Viðmerkingar:**
Sum flestu tingmonnum kunnugt, so játtaði tásitandi landsstýri (Javnaðar-, Fólka- og Tjóðveldisflokkurin) í juni 1975 til Meginfelag Útróðrarmanna tann stuðul, sum nevnda felag ynskti til stovnan av eini fiskasølu fyri útróðrarmenn. Landsstýristilsøgnin nevndi bæði juridiska hjálp, fíggjarliga og aðra hjálp, men Meginfelag Útróðrarmanna tók ikki av fyrr enn nú, tá M.Ú. hevur stovnað cina sølumiðstøð, L/F Sølumiðstøð Utróðrarmanna, og heitir M.Ú. nú á Føroya Løgting um at útvega landsstýrinum heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri einum rakstrarláni uppá 5 mió. kr., sum sølumiðstøðin skal taka í føroyskum bankum.

Allir tingmenn hava fingið bræv um hesa umbøn M.Ú., og sum skilst, er cin treyt fyri, at bankarnir vilja útvega nevnda rakstrarlán, at landsstýrið veðheldur fyri upphæddini.

Líknandi landskassaveðhald eru ikki óvanlig. Eitt nú veðhald fyri sildamjøli og øðrum fiskavørum á goymslu, veðhald og partapening í Faromar (Føroya Fiskasøla) o.s.fr.

Vandin fyri undirbjóðing á útlendska marknaðinum føroysk sølufeløg sínámillum eigur ikki at koma fyri, av tí at landsstýrið skal góðkenna søluprís — í hvørjum føri sær — áðrenn útflutningsloyvi verður givið.

Hin vegin eru væl allir tinglimir á einum máli um, at frí kapping bæði í keypi og sølu er sunnari enn einkarrættur — monopol — óansæð hvussu hesin »einkarrættur« er framkomin og virkar.

Kann henda Sølumiðstøð Útróðrarmanna ávirka hægri avreiðingarprís og betri nøgd millum útróðrarmenn, so er nógv vunnið. Ikki minst í tí, um hesin partur av fiskivinnuni kundi komið nærri at hvílt í sær sjálvum uttan tann støðugt vaksandi almenna stuðulin til fiskivinnuna. —

Tí er væl eingin ivi um, at allir flokkar á tingi og allir tinglimir eru samdir um at ganga Meginfelag Útróðrarmanna á møti í teirra umbøn um landskassaveðhald upp til 5 mió. kr. Serstakliga tá her er talan einans um veðhald og ikki beinleiðis útgjalding, sum so statt ikki kemur at nerva landskassans likviditet.

Tað er ei heldur talan um útflyting av óviðgjørdum fiski, men fiski, viðgjørdur á føroyskum flakavirkjum.

1. viðgerð 15. november 1982. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 10. november 1982 og undir 1. viðgerð 15. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini hava umboð fyri L/f Sølumiðstøð Útróðrarmanna verið á fundi og greitt frá sjónarmiðum teirra.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Ove Mikkelsen, Atli P. Dam og Adolf V. Hansen) tekur undir við málinum, og Adolf V. Hansen tilskilar sum støðu sína:

Minnilutin tekur við uppskotinum, av tí at tað er identiskt við ynski frá Sølumiðstøð Útróðrarmanna, og tá landskassin frammanundan vanliga veðheldur fyri líknandi fyritøkur. Í hesum sambandi skal vera gjørt vart við, at tá landsstýrið í skrivandi løtu veðheldur við 22 mió. kr. fyri L/f Grønlandsfelagið.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) førir fram:

Uppskotið er í innihaldi líkt tí skrivi, sum frammanundan er sent landsstýrinum frá Meginfelag Útróðrarmanna. Skrivið varð beint til viðgerðar í landsstýrinum. Seinri hevur Meginfelag Útróðrarmanna heitt á allar tingbólkar um at gera málið til tingmál. Út frá hesum setir minnilutin Asbjørn Joensen einki uppskot fram í máli Tjóðveldisfloksins.

2. viðgerð 16. mai 1983. Uppskotið frá Ove Mikkelsen §1 fall við 15-0. Atkvøtt varð við navnakalli:

Ja atkvøddu: Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Nielsen, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddur: Jóannes Dalsgaard.

F.L.j.nr. 1539-6

# 27. Spurningurin um arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðul

Ár 1982, mikudagin 10. november legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta niður eina skjóttarbeiðandi nevnd við 6 limum umboðandi umsiting og fakfelagsrørslu við tí setningi at

1) kanna allan arbeiðsloysisspurningin,
2) gera uppskot til almenna arbeiðsávísing og
3) gera uppskot til almennan arbeiðsloysisstuðul,

at leggja fyri løgtingið í seinasta lagi 1. apríl 1983.

**Viðmerkingar:**

Spurningurin um at seta á stovn almenna arbeiðsávísing og arbeiðsloysistrygging ella -stuðul hevur verið frammi fleiri ferðir á tingi eins væl og innan fakfelagsrørsluna í Føroyum.

Tann 16. mars í ár skrivaði Føroya Arbeiðarafelag til løgtingið og gjørdi vart við, at arbeiðsloysi var í landinum. Í sama skrivi heitti Føroya Arbeiðarafelag á løgtingið um at fáa eina nevnd setta til tess at kanna allar spurningar í sambandi við arbeiðsloysi og til tess at umlugsa almenna arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðul.

Mælt varð til at lata nevndina vera samansetta av umboðum fyri fakfeløgini og avvarðandi almennar stovnar.

Hetta skrivið frá Føroya Arbeiðarafelag varð beint í fíggjarnevndina, og síðani er einki hoyrt aftur um hetta mál.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum er lítið og einki broytt, síðan nevnda skriv varð handað tinginum.

Hóast vit eingi beinleiðis tøl hava fyri arbeiðsloysi, so bendir alt, m.a. upplýsingar frá fakfeløgunum, á, at arbeiðsloysi veruliga er í Føroyum í dag.

At arbeiðsloysi er millum ungdómin, er prógvað við »*Frágreiðing um arbeiðsstøðuna hjá ungfólki í Føroyum*«, ið er gjørd av Hagdeild og Støðisútbúgving í juli í ár.

Javnaðarflokkurin er greiður yvir, at tað kann vera torført at allýsa arbeiðsloysi, tá hugsað verður um tað serliga vinnulívsmynstur, ið vit hava í Føroyum. Flokkurin er eisini greiður yvir, at tað ikki uttan víðari er møguligt at seta á stovn sama slag av arbeiðsloysistrygging, sum t.d. galdandi er í Danmark.

Hin vegin metir flokkurin, at støðan nú er so mikið álvarsom fyri tey, sum eru uttan fast arbeiði, at nakað má gerast, og mælir tí til, at sett verður ein skjóttarbeiðandi nevnd til at kanna allan henda spurning og til at gera uppskot um eina føroyska arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðulskipan.

Tað er umráðandi, at henda skipan verður hóskandi til føroysk vjðurskifti, og meta vit eins og ávís fakfeløg, at hetta best verður tryggjað við at lata umboð fyri fakfeløg og almennu umsitingina gera kanningar og uppskot. Mælt verður til, at sett verður ein nevnd við 6 limum, har landsstýrið tilnevnir teir 3 og arbeiðarafeløgini teir 3. Tað verður eisini mælt til, at nevndin fær eina tíðarfreist til sítt virksemi, fyri at tingið skal kunna tryggja sær, at málið ikki fær somu lagnu sum seinast, nevnd varð sett at arbeiða við hesum spurningum.

Javnaðarflokkurin undirstrikar, at hann hóast fyriliggjandi uppskot enn sum áður er av tí áskoðan, at besta arbeiðsloysistrygdin er, at førdur verður ein arbeiðsskapandi politikkur á tingi og í kommunum til eina og hvørja tíð. Uppskotið skal tí ikki takast sum eitt tekin um, at flokkurin er farin burtur frá sínum sjónarmiði, men sum ein ásannan av, at tað ikki sær ljóst út fyri einum arbeiðsskapandi politikki, so leingi borgarliga samgongan ræður fyri borgum.

Í løtuni er støðan tann, at tann einasti møguleiki, sum tey arbeiðsleysu hava, er styrkveiting eftir eini forsorgarlóg, sum ikki kann metast við arbeiðsloysisstuðul — heldur ikki um alt gongur eftir vild við at fáa bøtt um hesa somu forsorgarlóg í hesi tingsetu.

Út frá hesum viðmerkingum setir Føroya Javnaðarflokkur fram hetta uppskot til samtyktar.

Hóast vit eingi beinleiðis tøl hava fyri arbeiðsloysi, so bendir alt, m.a. upplýsingar frá fakfeløgunum, á, at arbeiðsloysi veruliga er í Føroyum í dag.

1. viðgerð 15. november 1982. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 23. mars legði fram soljóðandi

## Álit
## í
## løgtingsmáli nr. 27/1982: Spurningurin um arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðul.

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 15. november 1982 beint í sosialu nevndina.

Málið snýr seg um at seta eina skjóttarbeiðandi nevnd til at kanna arbeiðsloysisspurningin og at gera uppskot til almenna arbeiðsávísing og almennan arbeiðsloysisstuðul.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður víst til skriv frá Føroya Arbeiðarafelag til løgtingið við áheitan um at fáa eina slíka nevnd setta sum skotið upp í hesum løgtingsmáli.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) ásannar, at arbeiðsloysi í ein vissan mun ger seg galdandi her á landi, men er av tí áskoðan, at besta trygdin er, at tað til eina og hvørja tíð verður førdur ein arbeiðsskapandi politikkur á tingi og í landsstýri eins og í kommununum. Tað má tí vera uppgávan fyrst og fremst hjá sitandi landsstýri at kanna arbeiðsmarknaðarstøðuna og meta, um neyðugt er við teim tiltøkum, sum uppskotið til samtyktar miðjar ímóti.

Meirilutin setir tí fram hetta

## Uppskot
## til
## samtyktar

Løgtingsmál nr. 27/1982: Spurningurin um arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðul verður beindur til landsstýrið til víðari viðgerð.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins og mælir til, at 6-mannanevndin arbeiðir í sambandi við Løgtingsins sosialu nevnd til tess at tryggja, at sosiala nevnd fær medávirkan og medábyrgd.

2. viðgerð 24. mars. Atkvøðugreiðsla seinri sama dag. Uppruna-uppskotið fall við 15-0. Uppskot frá meirilutanum í nevndini varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

# 28. Eykastuðul til útróðrarmenn

Ár 1982, mikudagin 10. november legði Asbjørn Joensen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

I. Landsstýrinum verður álagt skjótast at skipa fyri ískoytisstuðuli til teir útróðrarmenn, ið ómynstraðir hava verið knýttir at báti, ið rekur heimaútróður burturav í tíðarskeiðinum juli-november í ár.
Sum grundarlag fyri stuðulinum eigur minstaløn in at verða nýtt.

II. Heitt verður á landsstýrið sum skjótast at endurskoða alla stuðulslóggávuna til fiskivinnuna saman við avvarðandi feløgum.

**Viðmerkingar:**

Tað er sum kunnugt vinnuliga ein ótryggur lutur at hava úrtøkuna av tí, havið gevur.

Náttúrligar orsøkir eiga sín part av hesum ótryggleika, meðan ein parturin kann góðskrivast tí av okkum skipaða veiðu- og stuðulsmynstri.

Hvat veiðumynstrinum viðvikir, so skipaði hetta høga ting fyri broytingum, tá veiðuloyvi fyrst í sjeytiárunum vórðu givin trolarum við sakkunnleikafrásøgn um tað neyðuga í hesum tiltaki til veiðu eftir flatfiski.

Hvat hetta gjørdist byrjanin til viðvíkjandi trolveiðu, siggja vit best í dag.

Hetta hevur sum kunnugt havt ringa ávirkan á fiskiskapin hjá teim, ið framvegis royna at troyta sín lítla part av grunnunum við línu. Hin vegin fingu vit eisini í sjeytiárunum stuðulslóggávu til fiskivinnuna, ið kom at hava óhepna ávirkan, solciðis at har hjálpin veruliga er fyri neyðini, røkkur hon í lítlan ella ongan mun, um hon ikki beinleiðis er til bága.

Hesir faktorar, tann náttúrligi og tann politiskt skipaði, hava hond í hond hetta heystið tikið lívsgrundarlagið burtur hjá teimum útróðrarmonnum, ið røkja nærleiðirnar á traditionellan hátt við línu. Í ávísum bygdum eru útróðrarmenn av nevndu orsøkum ómetaliga illa fyri, hvat úrtøku viðvíkir.

Fáur teirra hevur vunnið meira enn tær 3-4.000 kr. um mánaðin í meðal síðani august í ár.

Alla hesa tíð hava hesir útróðrarmenn verið knýttir at báti teirra fyri at nýta ta fiskiløtu, ið gavst.

Hvør støðan fíggjarliga er í hesum mongu útróðrarheimum kring landið, hevur ikki nærri viðmerking fyri neyðini, bert kann verða skoytt uppí, at minstalønin í dag er kr. 8.915,-, og eigur munurin millum hesa og tað, ið vunnið er, at verða útjavnaður við stuðuli úr landskassanum í bræði.

Lóggávan sjálv um ráfiskagrunnin um stuðul sum heild til fiskivinnuna eigur skjótast at verða endurskoðað í samráð við avvarðandi felag.

1. viðgerð 22. november 1982 saman við tingmálunum nr. 36: Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna og nr. 32: Trygdarløn útróðrarmanna.

Formaðurin boðaði síðani frá, at málið varð afturtikið av uppskotsstillaranum.

---

# 29. Uppbýting og friðing av landgrunnunum til endurvøkstur av fiskastovnunum

Ár 1982, mánadagin 15. november legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Við tí fyri eyga at fáa fiskastovnarnar aftur á føtur áleggur tingið landsstýrinum at taka upp samráðingar við vinnulívið og viðkomandi

fakfeløg um eitt uppbýti av landgrunninum í fylgjandi fimm sløg av økjum:

Økir bert loyvd opnum bátum (innarlaga)
økir bert loyvd línu, snøri og snellu
økir loyvd smáum trolarum (grynri vatn)
økir loyvd stórum trolarum og partrolarum (á djúpum vatni) og
økir, har øll veiða í longri ella stytri tíðarskeið er bannað.

Í møguligum tíðaravmarkingum eigur hædd at vera tikin fyri teirri tíð, vøksturin á botni hevur um at koma fyri seg aftur, og teirri tíð, tað tekur hýsu, toski og upsa at náa gýtingaraldurin.

Landsstýrinum verður álagt at taka fyrivarni hesum viðvíkjandi í øllum teim fiskivinnuavtalum, gjørdar verða fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 1983, til sáttmálin ella rammusáttmálin gongur út.

Lógaruppskot viðvíkjandi uppbýting av landgrunninum verður av landsstýrinum at leggja fyri tingið í seinasta lagi 12. januar 1983.

**Viðmerkingar:**

Tað er gott, og tað er rætt at tryggja øll í samfelagnum fíggjarliga. Hetta er partvíst gjørt, men langt er eftir á mál. Soleiðis kann nevnast, at útróðrarmenn enn at kalla ongan tryggleika hava, um veðrið svíkur. Heldur ikki eiga vit at gloyma at tryggja teimum veiðimøgulcikar. Og at ansa eftir, at vit ikki lata veiðugrundarlagið verða tikið undan teimum.

Vit føroyingar hava í mannaminni livað av tí, ið havið hevur at bjóða uppá. Havið hevur fyri okkum sum veiðiøki verið so ómetaliga stórt. Vit hava kunnað farið hagar, vit vildu, alt eftir hvar fiskur var at fáa, og uttan at hava fyri neyðini at hugsa um verju av fiskastovnunum, við tað at okkara veiðunøgd í mun til støddir stovnana var fyri einki at rokna.

Okkara veiðiøki fevndi um havið millum 40° og 80° n.br. og millum Labrador í vestur og Novaja Zemlja í eystur heilt fram til 1. januar 1977. Síðan eru vit stig fyri stig riknir inn um 200 fj. úr egnum landoddum.

Hesi avmarking í havsins frælsi er nakað, vit sjálvir eiga lut í og tí megu læra at liva við, so hvørt vit verða riknir inn um egna 200 fj. fiskimark.

Aðrir hugsa so nógv um økt av fiskastovnum og lívið í havinum, at teir nú eisini vilja sleppa at fyriskipa veiðuni inni á okkara havøki. Tað er eingin loyna, at vit hava givið teimum lítlafingur við at loyva teimum at ráða yvir okkara laksa- og hvalaveiðu.

Men ásannast má, at røkt av okkara fiskastovnum er meira neyðug í dag enn nakrantíð áður. Vit megu ikki sita hendur í favn og bíða eftir, at aðrir skulu koma higar at røkja ella fyriskipa røkt av okkara fiskastovnum ella landgrunni. Her megu vit, umboð fólksins, vera okkara uppgávu vaksnir, kenna ábyrgd og tí taka okkum um reiggj, um lív eisini skal vera okkara eftirkomarum lagað her á hesum oyggjum.

Tann føroyski politiski fiskivinnupolitikkurin kundi og kann framvegis nevnast við einum dupultorði: **Løtuvinningur.** Tað er hugstoytt at vita, at vit føroyingar, so bundnir vit eru at tí, ið havið gevur, ikki eru komnir longri í fiskivinnupolitikki á tí politiska økinum enn til løtuvinning. Tað er tí ikki torskilt, at útlendingar nú eru byrjaðir, um enn í tí smáa, at fyrskipa innan okkara øki.

Hetta ábyrgdarloysið politikaranna, bert til fyrimun fyri landsskaðiligan løtuvinning, má halda uppat, og tað ongantíð ov skjótt. Fiskastovnarnir eru, uttan mun til hvat fiskifrøðingar verða freistaðir at siga, niðurfiskaðir í so stóran mun, at fiskurin, ið nú um stundir verður landaður, er sum hýsukálvar, smáfiskur og seiðamurtur at rokna í mun til tær støddir, landaðar vóru fyri 10-15 árum síðan.

Fiskifrøðiliga sigur hetta hvørjum mansbarni, at tá einki verður sett við til gýtingarbúgving, so er dagurin við totalum fiskaloysi ikki langt burtur.

Vit, ið ikki eru blaðung meira, kunnu minnast, hvussu smáur fiskurin var fyrst í fimtiárunum, og tað fiskaloysi, ið fylgdi. Vit minnast frá fimtiárunum, hvussu fiskurin við Noregs strendur gjørdist minni og minni, og tað fiskaloysi, ið fylgdi. Frá teirri tíðini minnast vit eisini Ísland og Grønland frá sekstiárunum.

Føroyingar hava soleiðis upplivað ferð eftir ferð, at stovnarnir hava verið uppfiskaðir, og tekin eru um, at hetta skal henda her hjá okkum nú. Men tann munur er á, at meðan vit í fimti- og sekstiárunum enn høvdu havsins frælsi og soleiðis bert høvdu at flyta til aðrar strendur. so hava vit ongastaðir at fara í dag, um vit í líkasælu ella við løtuvinningi fyri eyga lata okkara fiskastovnar niðurfiska enn einaferð.

Tað er ikki, so sum tað mangan verður sagt, bara trolið, sum hevur skuldina, tá fiskaloysi er. Tað eru so nógv onnur fyribrigdi, ið kunnu vera orsøkin til fiskaloysi, men hesum fyribrigdum eru vit ikki harrar yvir. Men vit vita, at tey fiskaloysi, ið komin eru av menniskjans ávum, og tá serliga tey, ið nevnd eru omanfyri, og sum vóru undir Føroyum, við Noreg, undir Íslandi og í Grønlandi, komu beint eftir ovur-

honds stóra trolveiðu á somu økjum.

Hóast hetta ikki prógvar, at trolveiðan í yvirmát var orsøkin, so er valla nakar, ið ivast í, at júst henda yvirfisking var orsøkin til niðurfiskingina av stovnunum.

Júst í hesum døgum hava vit brúk fyri at fáa tað optimala burtur úr okkara fiskastovnum og at fáa øll fiskasløg upp á land, eisini, og kanska serstakliga, tey, ið bert trolarar kunnu veiða. Tí hava vit ikki ráð til so einoygda talu sum: Burtur við trolarunum. Men vit hava heldur ikki ráð til at vága, at tað fiskaloysið, hvørs týðiligu tekin eru at síggja norðanfyri, fær loyvi at verða verandi ella at vaksa.

Vit megu nú, og tað ongantíð ov skjótt, taka saman hendur og finna ein máta at uppafturbyggja teir niðurfiskaðu stovnarnar. Við tað at tekur fleiri ár at uppafturbyggja stovnarnar, so megu tey tiltøk, komið verður fram til, vera av varandi karakteri, t.v.s. bann ella friðingar, sum standa við í eini 10-15 ár.

Við tílíkum tiltøkum, ið her verða skotin upp, tryggja vit útróðrarmannin, fiskimannin, báta- og skipaeigarar, virkini og tað fólk, ið har arbeiðir, ikki bert eina tíð, men yvir longri tíðarskeið.

1. viðgerð 22. november 1982. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 3. mai 1982 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 15. november 1982 og við 1. viðgerð 22. november 1982 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur Dam Jacobsen, Olaf Olsen, Jógvan I. Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Frederik Olsen) vísir á løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 við seinri broytingum um fiskiveiði á landleiðini, har sagt verður í §4, 1. stk.: »At skipa fyri fiskiskapinum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, er landsstýrinum saman við løgtingsins fiskivinnunevnd heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, tað er reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskiháttir, avmarking av veiðinøgd, avmarking av veiðiorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk.«

Við hesi lóg hevur Føroya løgting lagt hetta málsøki til landsstýrið og løgtingsins fiskivinnunevnd at umsita, og setir meirilutin sostatt

einki uppskot fram.

Minnilutin (Juul Jacobsen og Hans Marius Joensen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 6. mai 1983. Uppskot um at beina málið aftur í fiskivinnunevndina fall við 21-0. Uppskotið frá Adolf Hansen fall við 8-0.

---

# 30. Arbeiðsskapandi lógarbroytingar

Ár 1982, mánadagin 15. november legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið, innan 15. december 1982, arbeiðsskapandi broytingar í tolllóggávuni. Lógarbroytingin skal gerast soleiðis, at allur innflutningur av eykalutum til fiskifør og flutningstól (bilar, trukkar, farmaskip o.l.) verður toll- og avgjaldsfríur. Líkaleiðis skal lógarbroytingin gerast soleiðis, at allur ídnaður fær endurgoldið øll avgjøld av tí parti av framleiðsluni, ið verður útfluttur.

**Viðmerkingar:**
Fyri umleið einum hálvum ári síðani kom fram á fundi millum floksformenninar øðrumegin og bilhandlara og verkstaðseigarar hinumegin, at bilhandlarar og verkstaðseigarar vóru illa fyri fíggjarliga, orsakað av minkandi peningaumfari millum manna. Teir vóru í teirri støðu at skula senda lønmóttakararnar heim, komu ikki stórar broytingar í.

Politikkararnir hava tvinnar møguleikar at koma omanfyrinevndu bilhandlarum og verkstaðseigarum til hjálpar.

a) at lækka tollin á innfluttum bilum og harvið fáa eitt hækkað salg
b) at lækka ella avtaka tollin á eykalutum og harvið skapa meira viðlíkahaldsarbeiði á verkstøðunum.

ad a) Henda loysnin vil geva bilhandlarum og verkstaðseigarum møguleika at klára seg fíggjarliga, men vil samstundis minka um viðlíkahaldsarbeiðið og harvið vaksa um arbeiðsloysið. Hon vil vaksa um innflutningin og harvið eisini vaksa um uttanlands lán og uttanlands skuld, ella við øðrum orðum: ein fyri lønmóttakararnar og samfelagið vánalig loysn.

ad b) Henda loysnin vil líkaleiðis geva bilhandlarum og verkstaðseigarum møguleika at klára seg fíggjarliga og vil samstundis vaksa um viðlíkahaldsarbeiðið og minka um arbeiðsloysið. Hon vil minka um innflutningin, minka um uttanlands lántøku og uttanlands skuld. Hetta er sostatt ein fyri lønmóttakarar og samfelagið betri loysn.

Eitt annað øki, ið eisini má havast í huga, eru skipasmiðjurnar og tað arbeiði, hesar geva. Vit hava í seinastuni í ymsum tíðindabløðum lisið um, hvussu illa stendur til við arbeiði hjá eini av skipasmiðjunum. Vandi er fyri, at alt fólkið verður sent til húsa, og er tað tí umráðandi frá politiskari síðu at koma til hjálpar eisini á hesum øki.

Vit hava her á landi eitt byrjandi arbeiðsloysi, enn kanska kamuflerað í deiltíðararbeiði við færri og færri tímum forvunnum. Eisini hier hava politikararnir ábyrgd av at taka sær um reiggj.

Við at velja omanfyri nevnda møguleika b), hjálpa vit bilhandlarum og verkstaðseigarum út úr teirra fíggjarligu trongstøðu, hjálpa skipasmiðjunum at gerast meira kappingarførar mótvegis útlendskum skipasmiðjum og skapa ein hóp av nýggjum arbeiðsplássum. Við at velja henda møguleika, ið nevndur er í uppskotinum til samtyktar, skapa vit fyritreytir fyri at vinnulívið kann útvega fleiri hart tiltrongd nýggj arbeiðsplássir, og samstundis skapa vit fíggjarligt støði hjá vinnulívinum at standa á.

1. viðgerð 22. november 1982. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 30. november. Uppskotið fall við 5-0 atkvøðum.

# 31. Uppskot til samtyktar um kollegiumbygging

Ár 1982, hósdagin 18. november legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnarðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

I. Løgtingið ásannar, at tað almenna nú má taka sær av bústaðarspurninginum hjá ungdóminum í læru, ungdómi í arbeiði uttan fyri heimbygdina og annars øðrum, sum ikki sjálv eru før fyri at fáa sær tak yvir høvdið.

II. Løgtingið áleggur tí landsstýrinum at leggja uppskot til lóg um almenna kollegiibygging fyri løgtingið í komandi ólavsøkutingsetu.

**Viðmerkingar:**

Íbúðarspurningurin er enn hóast nógv almenn tiltøk framvegis ein sera álvarsamur spurningur.

Á teimum stóru plássunum og kanska mest í Havn er hesin spurningur serliga álvarsamur, av tí at nógv ung søkja til fyri at fáa sær eina og hvørja útbúgving.

Tey, sum eru so heppin at fáa innivist á skúlaheimum, sum eru knýtt beinleiðis at lærustovni, t.d. kostdeildini í Hoydølum, háskúlanum, skúlaheiminum, sjúkrasystraskúlanum og læraraskúlanum, eru ikki so ógvuliga nógv í tali. Mett verður eftir upplýsingum í fjør frá lærustovnum í Havn, at eini 500 ungfólk av bygd støðugt eru í Havn undir eini hvørjari útbúgving.

Til hesi 500 fólkini eru umleið 125 búpláss tøk á nevndu lærustovnum.

Aftrat hesum koma so tey mongu ungu og tilkomnu og eldru, ið liva einsamøll, sum hvørki hava hús ella egna íbúð.

Somuleiðis eru tað mong ung í Havn, sum heldur vilja sleppa at búgva fyri seg sjálvan, ella sum eru noydd at búgva fyri seg sjálvan.

Øll hesi fólk hava bert tann eina bústaðarmøguleikan, og tað er at fara út á tann privata íbúðarmarknaðin. Ein kann so vóna at vera

heppin og fáa eitt gott kamar fyri ein hampuligan prís. Men nógv eru tey, sum noyðast at taka av vánaligum og dýrum tilboðum. Upp aftur onnur noyðast í mánaðir til at deila kamar við ein kammerat, til tað eydnast at finna eitt kamar í onkrum kjallara.

Í fyrispurningi, sum uppskotsstillarin setti Eilif Samuelsen, landsstýrismanni, í fjør (tingmál nr. 5/1981), varð víst á, at tað almenna, sum jú hevur høvuðsábyrgdina av, at tey flestu læruplássini liggja í Havn, eisini má átaka sær ábyrgdina fyri at hýsa tí ungdómi, sum søkir hesi lærupláss.

Í svari 7. september 1981 segði landsstýrismaðurin m.a.:

»Hetta landsstýrið er sinnað at virka við til at skapa møguleikar fyri betri bústaðarviðurskiftum hjá tí ungdómi, sum kemur til Havnar at søkja sær útbúgving.«

Tá landsstýrið soleiðis fyri einum ári síðani hevur sagt seg til reiðar at gera nakað við bústaðarspurningin hjá teimum ungu, má tað metast at vera beint nú eitt ár eftir hetta svar at taka málið upp aftur á tingi.

Hetta verður nú gjørt við einum uppskoti til samtyktar um kollegii-lóggávu og -bygging.

Landsstýrið, ið bæði hevur íbúðagrunn og húsalánsgrunn til hjálpar, má kunna evna til eina kollegiilóggávu innan fyri rímuliga tíð. Møguliga kundi ein kollegiibygging verið framd og fíggjað í samstarvi við hesar grunnar. Tað er eisini umráðandi, at lógaruppskotið um kollegiibygging verður tilevnað í samráð við landsfelag føroyinga undir útbúgving og við landsfelagið av ungdómsfeløgunum.

At enda skal verða undirstrikað, at kollegiibygging ikki bert er tiltrongd í Havn, men eisini í Suðuroy, Eysturoy og Klaksvík.

Út frá hesum viðmerkingum verður hetta uppskot til samtyktar sett fram.

---

1. viðgerð 22. november 1982. Málið varð beint í sosialu nevndina.
3. december boðaði formaðurin frá, at málið var afturtikið.

# 32. Trygdarløn útróðrarmanna

Ár 1982, hósdagin 18. november legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið neyðugar lógarbroytingar, soleiðis at útróðrarmenn, ið eru við deksbátum yvir 10 brt. til støddar, kunnu mynstra fyri 15 dagar hvørja ferð, uttan mun til at teir avreiða dag um dag. Somuleiðis verður álagt landsstýrinum at broyta løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, soleiðis at mynstraðir útróðrarmenn við báti yvir 10 brt. tvær ferðir um mánaðin fáa útgoldið eina hálva mánaða minstuløn, tó frádrigið ta løn, teir hava forvunnið í sama tíðarskeiði. Lógarbroytingarnar skulu hava gildi frá 1. januar 1983.

**Viðmerkingar:**
Føroyingar vilja gjarna hava Føroyar mettar sum eitt vælferðarsamfelag, og eru tær tað eisini í mun til mong onnur lond. Tað er tí hugstoytt at vita, at kring oyggjarnar í dag gongur eitt ótal av útróðrarmonnum og familjum teirra og svølta, um ikki onkur privatur vísir teimum náði og miskunn í formi av kredittum og lánum. Verður ein løgtingsmaður sendur heim í einar 3-6 mánaðir, so fær hann fulla løn allar mánaðirnar. *Hann er tryggjaður.* Verður ein útróðrarmaður noyddur at vera heima av streymi og veðri, fær hann einki oyra at liva fyri. *Hann er ikki tryggjaður.* Nú eina tíð hevur svikið hjá útróðrarmonnum av fleiri orsøkum. Agnið hevur verið vánaligt, prísirnir í undirkanti. Veðrið hevur svikið, og fiskiskapurin hevur verið smáligur sum heild. Alt hetta hevur ført við sær, at tað besta fólkið á útróðrarbátunum søkir aðra vinnu. Bátarnir verða tí illa mannaðir (bert fólk uttan royndir) og hálvmannaðir og koma soleiðis inn í tann »ónda cirkel«. Týðin er inni, at tingmenn eiga at kenna ábyrgd fyri hesum partinum av fólkinum, ið bert hevur tann sonevnda

minstaforvinningin at líta á. Minstiforvinningurin virkar við fáum spreiddum undantøkum bert, tá ikki er brúk fyri honum, sbr. lógartekstin, ið sigur: »Treytin fyri skipanini (minstaforvinningi) er, at fiskifarið hevur avreitt, og at manningin verður avroknað, og....« Ein fyriskipan við minstuløn til útróðrarmenn, sum skotið upp her, kann tryggja útróðrarmannin og hansara mat í munnin og tryggjar útróðrarbátinum stabila manning við neyðugum royndum.

1. viðgerð 22. nov. 1982. Málið varð viðgjørt saman við málunum nr. 28: Eykastuðul til útróðrarmenn og nr. 36: Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna. Eftir atkvøðugreiðslu um at beina málini í fiskivinnunevndina, sum fall við 14-0, vórðu málini beind í fíggjarnevndina, sum 26. januar 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 18. novembef 1982 og undir 1. viðgerð 22. í sm. mán. beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Adolf V. Hansen og Jørgen Thomsen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskotið frá Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 1. februar 1983. Atkvøðugreiðslan 2. februar. Uppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1517-2-1

# 33. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1982, hósdagin 18. november legði Jørgen Thomsen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjóuvarp**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp verða hesar broytingar gjørdar:

1) §1, 3. stk. verður orðað soleiðis: »Sjónvarp Føroya verður rikið saman við Útvarpi Føroya.«
2) §2, 1. stk. verður orðað soleiðis: »Landsstýrið setir felagsstjóra fyri útvarpið og sjónvarpið eftir tilmæli frá útvarpsnevndini.«
3) §2, 2. stk. verður orðað soleiðis: »Landsstýrið setir eftir tilmæli frá útvarpsnevndini ein programleiðara fyri útvarpið og ein programleiðara fyri sjónvarpið.«
4) §6 verður orðað soleiðis: »Útvarpsnevndin virkar yvir sjónvarpinum á sama hátt sum yvir útvarpinum.«

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om fjernsyn.**

**§1.** I lagtingslov nr. 77 af 21. maj 1982 om fjernsyn foretages følgende ændringer:

1) §1, stk. 3, affattes således: »Færøernes Fjernsyn drives sammen med Færøernes Radio.«
2) §2, stk. 1, affattes således: »Landsstyret ansætter en fælles direktør for radioen og fjernsynet efter indstilling af radioudvalget.«
3) §2, stk. 2, affattes således: »Landsstyret ansætter efter indstilling af radioudvalget en programchef for radioen og en programchef for fjernsynet.«
4) §6 affattes således: »Radioudvalget fungerer over fjernsynet på samme måde som over radioen.«

**Viðmerkingar:**
Nú er drúgv tíð liðin, síðani lógin um alment sjónvarp varð samtykt her á tingi, men einki røkist fyri, at nakað veruligt hendir á hesum øki.

Skal sjónvarpið gagna landi og fólki og menna komandi ættarlið, má farast fram við størsta skynsemi.

At hetta er eitt av størstu álvarsmálum, er eingin ivi um, tí her gera vit nakað, ið uttan iva á ein serstakan hátt ávirkar føroyska fólkið og serstakliga tað ógvuliga viðkvæma barnasinnið og lyndið.

Við øðrum orðum, tað árin, ið fylgir sjónvarpinum eftir, grípur djúpari enn alt annað inn í føroysku fólkasálina. Tí hesar sendingar við livandi myndum verða førdar inn í so nær sum hvørja stovu her á landi, og hvørja ávirkan tær hendingarnar, ið har verða sýndar, hava á okkum øll, og serstakliga børnini, man fáur vita, men hetta setir uttan iva síni spor.

Verða tað bert útlendskar sendingar, ið verða bornar inn í hvørt heim her á landi, so kann væntast, at hetta árin førir við sær, at komandi ættarliðið kemur at hugsa minni føroyskt og meira útlendskt, enn vit gera í dag, og sostatt verður tað við til at máa burtur tað støði, ið føroysk mentan, fólka- og heimalív byggir á.

Tað kann heldur ikki vera rætt at gera sjónvarpið til sjálvstøðugan stovn, tí væntast má, at tað verður ódýrari við einum enn við tveimum stovnum. Tað ódýrasta hevði uttan iva verið at rikið útvarpið og sjónvarpið saman. Javnaðarflokkurin hugsar sær eina skipan við einum felags stjóra og einum programmleiðara fyri ávikavist útvarpið og sjónvarpið, og at sama nevndin verður fyri bæði sjónvarpið og útvarpið. Tí verður skotið upp, at útvarpsnevndin virkar á sama hátt yvir sjónarpinum sum yvir útvarpinum.

Í Løgtingstíðindum 1976, bind A, stendur soleiðis, sum her verður endurtikið: »Fíggjarnevndin hevur havt fund við Dánjal Paula Danielsen, landsstýrismann, og við stjóran fyri Útvarp Føroya, Niels Juel Arge. Á fundinum varð serliga umrøddur spurningurin um rakstrarætlan fyri húsið og nýtsluna av tøkum rúmum.

Tað varð upplýst, at gólvøkið í ætlaða húsinum er 2.200 m². Útvarpsstjórin upplýsti, at útvarpstænastan kann rekast við tí manning, ið nú er tøk, men er lagt upp fyri, at rúm er fyri meira fólki.

Umrøtt varð, hvat tað stóra studiorúmið kann nýtast til, og varð har serliga víst á sjónvarpsspurningin.

Samlaða grundøkið í sambandi við nýggja útvarpshúsið er upp á 11.600 m², og er ætlanin at hava hitaverksmiðstøð saman við Norðurlandahúsinum.«

Tað er Javnaðarfloksins metan, at tað hevur alstóran týdning, at

sjónvarpið fær so góðar umstøður at virka undir sum møguligt, og somuleiðis verður hildið, at skal sjónvarpið fáa mennandi og upplýsandi týdning, eigur so nógv senditilfar sum møguligt at verða framleitt í Føroyum.

Tað má haldast, at tær umstøður, ið bodnar verða við løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp, ikki geva sjónvarpinum arbeiðsumstøður til at framleiða hóskandi part av senditilfarinum, og at hesin rakstrarhátturin eisini vil gera raksturin av sjónvarpinum munandi dýrari, enn annars er neyðugt.

Til tess at rætta upp á hesar skeivleikar loyvir Javnaðarflokkurin sær at seta fram hjálagda uppskot um broyting í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp.

1. viðgerð 23. november 1982. Eftir atkvøðugreiðslu um at beina málið í serliga sjónvarpsnevnd, sum fall við 9-0, varð málið beint í lóganevndina, sum 7. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum og undir 1. viðgerð beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt til at leggja sjonvarpio og utvarpio saman soleiðis, at settur verður ein felagsstjóri og haraftrat ein programmleiðari fyri sjónvarpið og ein fyri útvarpið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Edmund í Garði og Agnar Nielsen) ger vart við, at lógin um sjónvarp varð samtykt í mai 1982 og hevur enn ikki fingið møguleika til at virka. Sostatt kann ikki sigast enn, um tað er neyðugt við broyting av lógini. Viðvíkjandi setan av stjóra og programmleiðara er at siga, at útvarpið longu hevur bæði stjóra og programmleiðara, tað eru tí ongar grundir til lógarbroyting viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftunum hjá útvarpinum. Meirilutin setir tí einki uppskot fram. Edmund í Garði er í prinsippinum samdur við uppskotsstillaran, men setir sum nevnt saman við meirilutanum einki uppskot fram.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá Javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 18. februar 1983. Atkvøðugreiðsla 4. mars. §1 fall við 13-1.

F.L.j.nr. 1910-2-1

---

# 34. Broyting í sjólógini

Ár 1982, hósdagin 18. november legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at fylgjandi ríkislógir um broytingar í sjólógini verða lýstar at galda í Føroyum:

1) Lóg nr. 230 frá 7. juni 1952 um broytingar í sjólógini.
2) Lóg nr. 94 frá 29. mars 1957 um broytingar í sjólógini.
3) Lóg nr. 227 frá 8. juni 1966 um broytingar í sjólógini.
4) Lóg nr. 205 frá 24. mai 1972 um broyting í sjólógini.
5) Lóg nr. 294 frá 23. mai 1973 um broyting í sjólógini.
6) Lóg nr. 227 frá 24. apríl 1974 um broyting í sjólógini.
7) §1 í lóg nr. 645 frá 13. december 1978 um broyting í sjólógini, luftfartslógini og lógini um avtalur í sambandi við altjóða vegaflutning.

**Viðmerkingar:**

Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nakrar broytingar í sjólógini verða lýstar at galda í Føroyum. Lógarbroytingarnar eru úrslit av norðurlendskum lógarsamarbeiði og eru eisini neyðugar fyri at kunna lúka ymsar millumlandasáttmálar á sjófartsøkinum.

Landsstýrið hevur kannað lógirnar og kann mæla til, at tær verða

settar í gildi í Føroyum.

Til tær einstøku lógarbroytingarnar skulu gerast fylgjandi viðmerkingar:

*Ad 1. Lóg nr. 230 frá 7. juni 1972:*
Í hesi lógarbroyting verða fleiri skyldur hjá skipsføraranum umborð nærri tilskilaðar, herundir skyldan hjá skipsførarunum at hava sjólógina og øll neyðug skipspappír umborð, at føra skipsdagbók, radiojournal og maskindagbók og at taka heim við skipsførarar og sjómenn, sum eftir sjómanslógini hava rætt til fría heimferð. Fyri ikki at lúka sínar skyldur kann skipsførarin verða revsaður við bót ella hefti.

Neyðugt er ikki at seta hesa lóg í gildi, um lógarbroytingin nr. 277 frá 8. juni 1966 verður sett í gildi, við tað at henda broytir tær reglur, ið vórðu settar í gildi í 1952.

*Ad 2. Lóg nr. 94 frá 29. mars 1957.*
Eftir hesi lógarbroyting verða ásettar nýggjar reglur um, nær eitt skip kann roknast sum danskt. Treytirnar fyri, at eitt skip kann skrásetast í Føroyum og koma undir føroyskt flagg, er, at tað lýkur treytirnar í § I í sjólógini. Eisini verður m.a. definerað, hvat skiljast skal við hugtakinum »ikki gjørligt at gera aftur«.

Reglurnar svara til tilsvarandi reglur í sjólógini hjá hinum norðanlondunum, soleiðis sum siður hevur verið við broytingum í sjólógini.

*Ad 3. Lóg nr. 227 frá 8. juni 1966.*
Í hesi lógarbroytingini verða ásettar nýggjar reglur um skyldur hjá skipsføraranum mótvegis reiðara og farmaeigara, eins og nakrar skyldur mótvegis tí almenna verða lagdar á hann.

Eftir lógarbroytingini verður eisini framd ein revisión av kapitlinum um skipbrot og nýggjar reglur um sjófrágreiðingar, sum eru av størsta týdningi fyri at fáa greiði á sjóvanlukkum, bæði frá almennari síðu og av privatum áhugamálum.

Eftir hesum reglum um skipbrot er m.a. grundarlagið fyri útrokning av vanligum skipbroti settar í gildi (York-Antwerpen reglurnar frá 1974).

*Ad. 4. Lóg nr. 205 frá 24. mai 1972*
Í hesi lógarbroyting verða gjørdar nýggjar reglur um partsreiðarí. Eitt partsreiðarí kann bert viðvíkja einum skipi. Luttakararnir í einum partsreiðarii hefta persónliga, men pro rata fyri skylduna hjá reiðarínum. Avgerðir um virksemi hjá partsreiðarínum kunnu takast við

meirilutaavgerð. Heraftrat verður reglan í §8 í sjólógini um reiðaraábyrgd av feilum og vansketni hjá starvandi umborð flutt til §233. Á sjófartsøkinum røkkur ábyrgd reiðarans longur enn tilsvarandi fyri arbeiðsgevarar á landi.

Eitt nýskrivað kapittul 11 inniheldur nútímansgjørdar og minni nágreiniligar reglur um sjópant, sum byggja á millumlandasáttmála hesum viðvíkjandi frá 1967. Hesar reglur eru av størsta týdningi fyri skipafíggingina. Eisini verða gjørdar broytingar í reglunum um fyrningartíð.

*Ad. 5. Lóg nr. 294 frá 23. mai 1973*
Eftir lógarbroytingini verður gjøgnumført ein modernisering av kapitli 5 um flutning av farmi og kapitli 6 um flutning av ferðafólki og ferðagóðsi.

Broytingarnar vórðu gjørdar, fyri at Danmark kundi ratifisera Haag-Visby sáttmálan, og eru sostatt reglur, sum ein er bundin til at nýta mótvegis skipum frá øðrum sáttmálastatum. Í hesum reglum finnast eisini reglurnar um, at reiðari, sum higartil kann avmarka sína endurgjaldsskyldu, t.d. hvat góðsi viðvíkir, til eina ávísa upphædd pr. flutta eind ella í mun til vektina á flutta farminum.

Reglurnar hava tað við sær, at har reiðarin áður kundi avmarka sína ábyrgd til 1.900 kr. pr. kolli, er hetta nú hækkað til antin 5.000 kr. pr. kolli ella 15 kr. kg av tí farmi, sum er skaddur ella seinkaður, alt eftir hvat gevur størstu upphæddina.

Viðvíkjandi ferðafólki kundi reiðarin áður avmarka sína ábyrgd til 20.000 kr. pr. ferðandi. Eftir nýggju reglunum er henda upphædd hækkað upp í 350.000 kr.

Eisini verða gjøgnumførdar nýggjar reglur um fyrningartíð og reglur um fylgjurnar av, at ein skipsførari er rúsdrekkaávirkaður undir arbeiði. Hesar reglur svara til reglurnar í ferðslulógini og loftferðslulógini.

*Ad. 6. Lóg nr. 227 frá 24. apríl 1974*
Eftir hesari lógarbroyting verður gjøgnumførd ein altjóða sáttmáli, ratifiseraður av Danmark, um tað sivilrættarligu ábyrgdina í sambandi við oljudálkingarskaðar.

Viðmerkt verður, at eigarin av skipinum, ið hevur flutt oljuna, sum er orsøkin til dálkingina, hevur objektiva ábyrgd av skaðanum. Møguligt er hjá eigaranum at stovna ein ábyrgdargrunn og harvið avmarka sína ábyrgd til eina ávísa upphædd pr. tons. Eigarar av slíkum tangaskipum hava skyldu at tekna trygging til rindan av møguleg-

um skaða og at hava umborð sertifikat, sum vísir, at tílík trygging er teknað.

So leingi henda lóg ikki er galdandi í Føroyum, hava føroyingar, ið hava liðið skaða av oljudálking, ikki møguleika fyri at gera nakað krav galdandi eftir lógarreglunum um ábyrgd av oljuskaðum og endurgjald frá tí serliga grunninum til rindan av skaða frá oljudálking.

*Ad. 7. § 1 í lóg nr. 625 frá 13. december 1978 um broyting av sjólógini v.m.*

Eftir hesi lógarbroyting verða endurgjaldsupphæddirnar, ið hava verið útroknaðar í mun til »francs«, broyttar til at verða roknaðar í mun til valutain SDR (serligi lánirættirin í International Valutagrunninum).

1. viðgerð 30. november 1982. Málið varð beint í lóganevndina, sum 12. apríl 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 18. november 1982 og við 1. viðgerð beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum mælir landsstýrið til at seta 7 broytingarlógir í sjólógini í gildi fyri Føroyar. Í viðmerkingunum er greitt nærri frá innihaldinum í lógabroytingunum.

Við skrivi dagfest 10. februar 1983 hevur landsstýrið sent lóganevndini eina nýggja broyting í sjólógini — lóg nr. 625 frá 8. december 1982 — og biðið lóganevndina taka hesa lóg til viðgerðar saman við hinum lógunum. Eintak av hesi lóg og notat um høvuðsinnihaldið í nevndu lógarbroyting fylgja við hesum áliti.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Øssur Dam Jacobsen og Jákup Lindenskov) setir fram fylgjandi

## Uppskot til samtyktar

Løgtingið góðkennir, at fylgjandi ríkislógir um broytingar í sjólógini verða lýstar at galda í Føroyum:

1) Lóg nr. 230 frá 7. juni 1952 um broytingar í sjólógini.

2) Lóg nr. 94 frá 29. mars 1957 um broytingar í sjólógini.
3) Lóg nr. 227 frá 8. juni 1966 um broytingar í sjólógini.
4) Lóg nr. 205 frá 24. mai 1972 um broytingar í sjólógini.
5) Lóg nr. 294 frá 23. mai 1973 um broyting í sjólógini.
6) Lóg nr. 227 frá 24. apríl 1974 um broyting í sjólógini.
7) §1 í lóg nr. 645 frá 13. december 1978 um broyting í sjólógini, luftfartslógini og lógini um avtalur í samband við altjóða vegaflutning.
8) Lóg nr. 625 frá 8. december 1982 um broyting í sjólógini.

Ein minniluti (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 26. apríl. Uppskotið frá nevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

---

# 35. Sáttmálastovnur

Ár 1982, hósdagin 18. november legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um sáttmálastovn.**

§1. At tryggja føroyskum skipaasmiðjum byggisáttmálar, sum mugu haldast neyðugir, at føroyskt skipasmíð kann halda fram, fær landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina heimild til at gera byggisáttmálar.

§2. Serligi sáttmálastovnurin sambært §1 skipar fyri praktisku inningini av sáttmálunum.

*2. stk.* At standa fyri stovninum velur løgtingið 2 limir og landsstýrið 1 lim, ið er formaður.

**lagtingslov om kontraktinstitut**

§1. Med det formål at sikre færøske skibsværfter de byggekontrakter, der må antages at være nødvendige, således at færøsk skibsbyggeindustri kan fortsætte kontinuerlig, bemyndiges landsstyret til i samråd med finansudvalget at indgå byggekontrakter.

§2. Administrationen af byggekontrakterne forestås iflg. §1 af en særlig institution.

*Stk. 2.* Institutionen bestyres af 2 af lagtinget valgte medlemmer og et af landsstyret valgt medlem, der er formand.

*3. stk.* Starvstíðin er 3 ár.

*4. stk.* Landsstýrið ger reglugerð fyri virki stovnins, ið verður at góðkenna av fíggjarnevndini.

*Stk. 3.* Funktionstiden er 3 år.

*Stk. 4.* Landsstyret udfærdiger regulativ for institutionens virksomhed. Regulativet skal godkendes af finansudvalget.

**§3.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp lán, ið neyðug eru eftir § 1.

**§3.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån, der er nødvendige i henhold til § 1.

**§4.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður at endurskoða í tingsetuni 1985.

**§4.** Denne lov træder i kraft straks og skal genbehandles i lagtingssamlingen 1985.

**Viðmerkingar;**

Fiskiskipafloti okkara hevur gjøgnum mong ár verið væl fyri, tí vit hava megnað at byggja skip, sum vóru hóskandi til sína vinnu.

Men nú mugu vit ásanna, at vit ikki eiga ein so góðan fiskiskipaflota, sum framvegis kann vera við í kappingini á fiskiveiðuøkinum.

Aldurin á fiskiskipum okkara í dag er í meðal 25 ár. Hetta sigur okkum klárt, at nú er neyðugt, at vit frá tí almenna skapa fyritreytirnar, so at vit aftur eru førir fyri at endurnýggja fiskiskipaflotan, skapa tíðarhóskandi amboð í fiskivinnuni.

Verða ikki álvarslig stig tikin nú beinanvegin til at endurnýggja fiskiskipaflotan, koma føroyingar aftur í somu trongstøðu, sum teir vóru komnir út í í 50-unum, tá skipaflotin at kalla allur, sum hann var, brádliga var ónýtiligur.

Avleiðingarnar vóru, at hópur av besta vinnuføra fólkinum leitaði av landinum at finna sær arbeiði, so tey kundu lívbjarga sær og sínum.

Tað tók drúgva tíð at vinna á aftur kreppuni í 50-árunum, og vit óttast stórliga, soleiðis sum stýrislagið nú aftur er í landinum, at hetta fer at endurtaka seg. Hetta má ikki henda.

Javnaðarflokkurin hevur fyrr lagt fram nágreinilig uppskot um, hvussu vit halda, endurnýggingin skuldi verið.

Í løtuni verður serstakliga hugsað um veiðimøguleikarnar á djúpum vatni, ið ikki verða troyttir í nóg stóran mun.

Vit eru førir fyri at endurnýggja skipaflotan á egnu skipasmiðjum okkara.

**Sáttmálastovnur**

Ein av meginvinnutáttunum hjá okkum, sum er og hevur verið av búskaparligum stórvirði og mennandi týdningi fyri handverksstættina, eru skipasmiðjurnar.

Týdningurin av at halda hesar verksmiðjur í hæddini er mangan ásannaður, men tó at so er, so hevur løgtingið ikki viljað tikið tað neyðuga stigið til at tryggja egnu skipasmiðjur okkara nóg væl.

Tann viðtøkan, sum løgtingið gjørdi á ólavsøku 1972, sí tingmál nr. 29/1972, var í grundini ein prinsipavgerð um, at skipasmiðjurnar skuldu haldast uppi, og harvið hevur løgtingið ásannað, at tingið vil lofta skipasmiðjunum, skuldu tær komið í trupulleikar.

Javnaðarflokkurin metir framvegis, at tað hevur alstóran týdning, at vit sum mest hava ein fjøltáttaðan arbeiðsmarknað í Føroyum.

Hóast løgtingið hevur ásannað hetta, t.d. við teimum ymisku íløgugrunnunum til ídnað og beinleiðis almennum lántøkum til ídnaðarendamál, so hevur undirtøkan til at leggja nóg gott støði undir tann partin av grundídnaðinum, sum skipaverksmiðjurnar eru, ikki verið til staðar.

Tað eru teir fáu, sum ikki nú ásanna, at neyðugt er at taka tøk á hesum øki.

Hóast fleiri stuðulslóggávur eisini eru til skipasmiðjuídnaðin og nýbygging serliga, so standa skipasmiðjurnar í dag mest sum tómar.

Vit byggja ein alt ov lítlan part av fiskiskipum okkara í Føroyum.

Ofta verða eisini umvælingarnar gjørdar uttanlands.

Skattaborgarin letur sín part til nýbyggingar, og tað meta vit alneyðugt og ásanna eisini, at spell er, at so stórur partur av hesum skattakrónum fer til byggingar uttanlands, men tað verður vøkkult, um vit bert brúka pening til skipasmíð uttanlands. Tá steðgar alt av sær sjálvum her heima.

Tá landsstýrið í 1972 hevði latið løgtinginum kanningina um fíggjarligu endurreisingina av Skála Skipasmiðju og Vestmanna Skipasmiðju, boðaði løgmaður Atli Dam á ólavsøku 1973 frá, at landsstýrið fór at leggja uppskot á ting fyri at tryggja skipasmiðjum okkara framhaldandi sáttmálar.

Hetta uppskot fekk ikki undirtøku tingsins, men tingið samtykti, at skipasmiðjurnar skuldu stuðlast. Vit hava síðani bygt mesta av skipaflota okkara uttanlands, samstundis sum skipasmiðjurnar í Føroyum ofta komu í fíggjarliga trongstøðu av politiskari togan og dráli — og hevur hetta verið orsøkin tit, at framhaldandi sáttmálar ikki kundu gerast.

Tað hevur kostað dýrt, nervað arbeiðsgongdina til stórt fíggjarligt

bakkast fyri ta skipasmiðjuna, sum var rakt, og fyri samfelagið.

Javnaðarflokkurin leggur nú fram uppskot um sáttmálastovn, sum skal kunna gera byggisáttmálar við skipasmiðjur við tí endamáli, at tær skulu hava møguleikan til framhaldandi nýbyggingar.

Í hesum sambandi er sjálvsagt neyðugt, at førdur verður miðvísur politikkur, so vit:

1. koma at fylgja eini tilrættarlagdari útbygging av skipaflotanum,
2. veita myndugleikunum møguleika at stýra útbyggingini og handlinum við skipum soleiðis, at øll øki í landinum eiga góðar møguleikar,
3. tryggja framhaldandi arbeiði á skipasmiðjunum,
4. halda skipasmíð í Føroyum í hæddini,
5. kunnu byggja eisini til útflutnings.

Neyðugt er, at sáttmálastovnurin hevur heimild til at gera sáttmálar soleiðis, at skipasmiðjurnar kunnu leggja tilrættis byggiprogramm síni framhaldandi. At hetta verður sambært reglugerð fyri stovnin, er sjálvsagt. Í frágreiðingini um skipasmiðjumálið í 1972 var niðurstøðan, at tað helst fór at vera ógjørligt at fáa framhaldandi skipabyggisáttmálar, verður ikki sáttmálastovnur gjørdur.

Hesin sáttmálastovnur skuldi gera sáttmálar, selja sáttmálar og liðugtgjørd skip, gera sáttmálar um leigu av fiskiskipum og um neyðugt hava heimild til at reka fiskifør — um tørvur var fyri tí.

Hóast ein meiriluti í fíggjarnevndini tá ásannaði, at tað var neyðugt fyri føroyskt skipasmíð at gera munandi ábøtur, so helt meirilutin ikki, at sáttmálastovnur var neyðugur.

Eftirtíðin hevur sannað, at sundurlyndið enn einaferð vann, at tað hevði verið tøkt, um vit í dag áttu ein sáttmálastovn, sum kundi gripið inn í viðurskiftini, skapt javnvág á arbeiðsmarknaðinum, skapt javnvág í tilgongdini úti um landið og tryggjað, at skip hóskandi til tøkar møguleikar vórðu bygd.

Høvdu vit sum lið í byggipolitikkinum einastu 4-5 árini t.d. bygt 10 trolarar sum »RANKIN« og »SUÐRINGUR« ella størri, hevði verið lættari hjá myndugleikunum at umsitið innflutningsbannið, tað hevði verið møguligt at knýtt størri skip við møguleikum á djúpum vatni at teim virkjum og plássum, sum hava umstøður fyri teim, meðan meðalstór skip gjørdust tøk hjá teim virkjum, sum slík hóska betur til. Í staðin verða hesi skip í dag keypt av kapitalsterkum fyritøkum ella gerast óneyðuga dýr at útvega hjá smávirkjum og smærri bygdum.

Javnaðarflokkurin ásannar, at hin mest gagnligi vegurin fyri samfelagið, fyri einstaklingin, er, at vit hava og gera brúk av øllum virkandi hondum.

Vit leggja uppskotið um sáttmálastovn fram, at føroyskt skipasmíð ikki skal koma í ta støðu, at tað ikki er fært fyri at vera við í framhaldandi endurnýggingini av fiskiskipaflotanum.

Vit kunnu ikki halda skipaflota okkara í hæddini, taka vit ikki dik á okkum og sjálvir byggja fiskiskip okkara í nógv størri tali, enn gjørt verður.

Skipasmiðjuídnaðurin má ikki smokka burturúr á nýbyggingarøkinum.

1. viðgerð 30. november 1982. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. januar 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Føroya Javnaðarflokki 18. november 1982 og undir 1. viðgerð 30. í sm. mán. beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) mælir til at samtykkja uppskot Javnaðarfloksins.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot Javnaðarfloksins út frá, hvussu byggingin av fiskiskipum til veiði á grynri vatni hevur tikið seg upp, serliga við tí í huga at útvega betri stýring á hesum viðurskiftum.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við málinum og tilskilar sum støðutøku sína:

Tað má sigast at vera ábyrgdarleyst av landsstýri og fíggjarnevnd at játta stuðul og veðhald til bygging av tveimum trolarum, sum bert kunnu fiska á grunnum vatni, nú tá støðan hjá fiskastovnunum er so vandamikil.

Hesir bátar, ið byggjast skulu á Tórshavnar Skipasmiðju, ein til P/r Føstuvarði, Miðvági, og ein til P/f Meðalsbrekka, Vestmanna, eru av eini tílíkari stødd, at teir bert kunnu koma at veiða av toska-, hýsu- og upsastovninum, tríggir frammanundan ovfiskaðir stovnar.

TAC fyri hesar tríggjar stovnar er uml. 60.000 tons. Hesir báðir trolararnir skulu tilsamans veiða 3.000 tons um árið ella 1/20 av TAC'inum fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Fyri ikki at kvala framburðshugin hjá hesum báðum feløgum og

fyri at skapa arbeiði á Tórshavnar Skipasmiðju, eigur tingið at gera eitt frávik í kravinum um 10% í eginpeningi í hesum einstaka føri.

Út frá hesum setir nevndi minniluti fram soljóðandi

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.**

**§1.** Í §3 í løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum verður sett sum stk. 2:

»Landsstýrið saman við fíggjarnevndini kann loyva frávik frá kravinum um 10% í eginpeningi í serligum førum, tá talan er um bygging av kostnaðarmiklum skipum, ið royna eftir fiskasløgum á djúpum vatni.«

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskerflådens fornyelse.**

**§1.** I §3 i lagtingslov nr. 24 af 1. juni 1978 om fornyelse af fiskerflåden tilføjes som stk. 2:

»Landsstyret sammen med finansudvalget kan tillade dispensationer fra kravet om 10% i egenkapital i tilfælde, hvor der er tale om bygning af kostbare fiskerfartøjer, der driver fangst på dybe vande.«

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

Sami minniluti (Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

**Uppskot til samtyktar**

Løgtingið tekur aftur landsstýrisins og løgtingsins fíggjarnevndar avgerð um bygging av trolskipum til ávikavist P/r Føstuvarði, Miðvági, og P/f Meðalsbrekka, Vestmanna, og áleggur landsstýrinum at fyriskipa bygging av einum djúpvatnstrolara á Tórshavnar Skipasmiðju og at bjóða henda trolara út til sølu uttan vinning fyri landskassan. P/r Føstuvarði og P/f Meðalsbrekka eiga forkeypsrætt til hetta skip, antin í felag ella hvør sær, um annað av nevndu feløgunum ikki vil vera við.

2. viðgerð 1. februar, atkvøðugreiðsla 2. februar.

Uppskotið frá Javnaðarflokkinum fall við 13-0. Lógaruppskot frá minniluta í fíggjarnevndini (Adolf V. Hansen) afturtikið og uppskot til samtyktar frá sama fall við 2-0 atkvøðum.

---

# 36. Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna

Ár 1982, hósdagin 18. november legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd henda broyting:

§4, 2. punktum verður orðað soleiðis: »Minstiforvinningurin er pr. 1. august 1982 650 kr. til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin.«

**§2.** Henda lóg fær gildi frá 1. august 1982.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.**

**§1.** I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændring:

§4, 2. punktum formuleres således: »Mindsteindtægten er pr. 1. august 1982 650 kr. til hver af mandskabet for hver fiskedag.«

**§2.** Denne lov træder i kraft 1. august 1982.

**Viðmerkingar:**
Í lógini um stuðul til fiskivinnuna stendur, at minstiforvinningurin skal vera 314 kr. fyri hvønn útróðrardag. Prístalsviðgjørd er upphæddin kr. 325,25 í dag.

Minstiforvinningurin til útróðrarmenn verður bert roknaður av sjálvum útróðrardøgunum.

Útróðrardagarnir hjá einum vælriknum útróðrarbáti koma sjáldan upp um 120 í einum ári. Meðaltalið fyri ein væl riknan útróðrarbát liggur millum 100 og 120 dagar, men vit vita, at tíðin, sum ein útróðrarmaður er upptikin av útróðrinum, er nógv longri, tí kann ikki sigast, at útróðrardagurin, sum hann er roknaður av Lønjavningargrunninum, svarar til arbeiðstíðina hjá útróðrarmanninum, men helst minst tað tvífaldað. Tí verður skotið upp at tvífalda upphæddina, sum er sett til minstaforvinning.

Heystið hevur verið óvanliga ringt í ár, soleiðis at nógvir útróðrarmenn eru illa fyri, og tí verður skotið upp, at henda lógarbroyting kemur í gildi frá 1. august í ár.

1. viðgerð 22. november 1982. Málið varð saman við málunum nr. 28: Eykastuðul til útróðrarmenn og nr. 32: Trygdargrunnur útróðrarmanna. Eftir atkvøðugreiðslu um at beina málini í fiskivinnunevndina, sum fall við 14-0, vórðu málini beind í fíggjarnevndina, sum 30. november 1982 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 18. november 1982 og undir 1. viðgerð tann 22. november beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins, men vísir á, at harvið eru ikki ábøtur framdar fyri teir, ið rógva út við opnum báti ella ómynstraðir við skipi yvir 100 tons.

Fíggjarnevndin vísir á, at tá ætlanin nú er, at minstiforvinningurin skal mótsvara dupultari dagløn fyri arbeiði á landi, má lógarbroyting fremjast viðvíkjandi dýrtíðarviðgerð av minstaforvinninginum.

Eftir §4, 2. stk. í løgtingslóg nr. 22 frá 7. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður minstiforvinningurin hækkaður við 3,75 kr. fyri hvørji 3 stig, prístalið er oman fyri 100. Tá stighækkingin fyri arbeiðsmenn er kr. 4,80, er beint, at hetta verður fingið á somu hædd, og eigur tí talið at broytast soleiðis, at nú verður tað 60 oyru tíman × 8 × 2 = kr. 9,60.

Sett verður tí fram soljóðandi broytingaruppskot til løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna:

**Broytingaruppskot**

**§1.** Í §4, 2. stk. verður í staðin fyri »3,75 kr.« sett »9,60 kr.«

**§2.** Henda lóg fær gildi beinan vegin.

**§1.** I §4, stk. 2 ændres »3,75 kr.« til »9,60 kr.«

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

Samsvarandi tí, ið er sagt um viðurskifti teirra, ið ikki rógva út við vanligum deksfiskifari, verður sett fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri tingið uppskot, ið fremja ábøtur fyri útróðurin, ið ikki kemur undir minstaforvinning, soleiðis at hesar ábøtur samsvara hækkaða minstaforvinninginum. Eisini mælir figgjarnevndin til, at landsstýrið greitt ásetir, hvørji fiskifør koma undir lógina um minstaforvinning, og hvørji koma undir aðrar møguligar skipanir.

2. viðgerð 30. november. Broytingaruppskot frá figgjarnevndini til §1 samtykt við 25-0, §1 soleiðis broytt samtykt við 25-0, §2 samtykt við 25-0. Uppskot til samtyktar frá figgjarnevndini samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 3. desember 1982. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1517-2-1 Lóg nr. 2, 6. jan. 1983

# 37. Setan av nevnd at kanna orsøkirnar til endurgjaldskrøv fyri vantandi góðsku av útfluttum fiskavørum

Ár 1982, týsdagin 30. november legði Petur Reinert, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya løgting samtykkir at seta nevnd av trimum kønum monnum at kanna orsøkirnar til tey mongu endurgjaldskrøv fyri vantandi góðsku, sum hava verið útfluttum føroyskum fiskavørum fyri seinastu árini.

**Viðmerkingar:**
Tað má haldast at vera øllum tingmonnum greitt, at føroyskur fiskaútflutningur seinastu árini hevur verið fyri millióna missi av endurgjaldskrøvum, tí góðskan hevur verið ov vánalig (reklamatiónum). Í hesum ári sigst missurin at vera farin upp um 10 milliónir krónur.

Av hesum fylgir, at føroyskar fiskavørur kunnu missa ta góða umdømi, tær hava havt í okkara keyparalondum, og at føroyskur fiskur ikki longur við rætti ber heitið »best in the world«.

Aðrar fylgjur eru, at lágu prísirnir, sum kunnu fáast fyri slíkar vørur, ávirka skiftisavlop virkjanna og solciðis eisini prísin á ráfiski.

Ikki er sagt, at feilurin allur liggur á einum staði. Í minsta lagi trý høvuðslið eiga at verða kannað gjølla: 1) kemur fiskurin nóg feskur og nóg væl hagreiddur upp á land, 2) fær fiskurin nóg góða viðgerð á virkjum okkara, og 3) fær fiskurin best møguligu viðferð í søluliðinum.

Vit hava ikki ráð at missa okkara góða navn og umdømi á fiskamarknaðinum, og vit hava ikki ráð at fara soleiðis við okkara ov smáu

botnfiskanøgdum, at tær søluvørur, sum fáast burturúr, ikki fáa besta prís.

Av avgerandi týdningi er at fáa uttanveltað fólk í hesa nevnd, sum eru fíggjarliga óheft av fiskivinnu og fiskasølu á ein og hvønn hátt.

1. viðgerð 3. december 1982. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 6. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 30. november 1982 og við 1. viðgerð 3. december 1982 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur í sini viðgerð av hesum máli havt fund við formannin í fiskivinnuráðnum og landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan I. Olsen, Olaf Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Fredrik Olsen, Hans Marius Joensen) gongur inn fyri, at vit fara so væl sum møguligt um allan okkara fisk fyri at fáa sum mest burturúr til land okkara sum heild, fiskur og tær ymisku fiskavørurnar skulu fgjøgnum nógvar hendur, og fyri at fáa tað besta úrslitið, so skal hvørt einstakt lið einki skeivt gera, um t.d. vøran er farin fgjøgnum 9 lið við hepnari hond, og tað 10. liðið ger nakað skeivt, so er allur ómakur hjá hinum oyðilagdur. Tað sama er, um fyrsta liðið ger okkurt skeivt, tá kunnu hini seinru liðini ikki rætta brekið aftur, líka mikið hvussu stóran ómak tey gera sær, tað er tí sera umráðandi, at øll liðini hava alstóran ans fyri góðskuni.

Tiltøk hava verið gjørd fyri at bøta um góðskuna, millum annað hevur landsstýrið fingið í lag eina røð av fundum millum teir ymisku bólkarnar, og tað verður arbeitt við snarkøling av fiski eins og best møguligari arbeiðsgongd bæði fyri fisk og fólk.

Meirilutin hevur einki ímóti at gera slíkar kanningar, skotið verður upp, men er av tí áskoðan, at í staðin fyri at seta eina serliga nevnd biðja fiskivinnuráðið um at lata hesar kanningar gera, teir kunnu seta eina nevnd til hetta arbeiði sambært ta heimild, teir hava í reglugerðini fyri fiskivinnuráðið, har §§ 2, 3 og 4 eru soljóðandi:

»**§ 2.** Tað er uppgáva ráðsins at gera kanningar og metingar á øllum økjum, sum viðvíkja fiskivinnuni, og koma við tilmælum til Føroya landsstýri.

**§ 3.** Arbeiði ráðsins hevur sum fyritreyt:

a) at miðað verður ímóti at gera best møguliga nýtslu burtur úr øllum

tí ríkidømi, sum finst í havinum kring Føroyar, og tí, sum kann útvegast av rávøru aðrastaðni.
b) at fiskastovnarnir við Føroyar verða varðveittir,
c) og at vinnuni verður tryggjað eitt trygt rakstrarligt støði.

**§4.** Til tess — út frá omanfyri nevndu málseting — at kunna gera sakligar metingar, útvegar ráðið sær allar upplýsingar um tað fiskiríkidømið, føroyingar kunnu troyta, um rakstrarmøguleikarnar hjá øllum pørtum í vinnuni, um møguleikar fyri góðsking á landi og eisini um marknaðir okkara og sølumøguleikar fyri tær fiskavørur, vit kunnu framleiða. Har, sum ráðið heldur tað vera neyðugt, setir tað sjálvt kanningar í verk fyri at útvega upplýsingar. Í hesi heildarmynd verður miðað ímóti størst møguligari tjóðarúrtøku, samstundis sum øllum liðum í framleiðsluni verður tryggjað sunt fíggjarligt støði.«

Í uppskotinum eru sett 3 høvuðslið, sum í minsta lagi eiga at verða kannað
1) kemur fiskurin nóg feskur og nóg væl hagreiddur upp á land,
2) fær fiskurin nóg góða viðgerð á virkjum okkara, og
3) fær fiskurin best møguliga viðgerð á søluliðinum.

Heraftrat, meta vit, eigur eisini at verða kannað, hvussu teir ymisku veiðuháttirnir ávirka fiskagóðskuna, tá fiskurin kemur úr sjónum.

Í samband við vraking og góðskumeting kundi nevndin hugsað sær eina skipan, har fólk frá vrakistovninum við ávísum millumbili, ella so ofta hetta hildið er neyðugt, ferðast runt fyri at vegleiða og kanna góðskumeting og vraking, so hetta verður so javnt og so gott sum møguligt um alt landið.

Allir føroyingar hava helst ikki nóg stóran ans fyri, hvussu stóran týdning góðskan av fiski hevur fyri samfelag okkara, tí átti at verið kunnað í skúlunum um tær mest grundleggjandi fyritreytirnar fyri at fáa eina so góða fiskavøru, sum til ber.

Út frá omanfyri framførda skjýtur meirilutin upp í staðin fyri upprunauppskotið fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at áleggja fiskivinnuráðnum sbrt. reglugerðini fyri fiskivinnuráðið um at lata kanna orsøkirnar til tey mongu endurgjaldskrøv fyri vantandi góðsku, sum hava verið útfluttum før-

oyskum fiskavørum fyri seinastu árini, og at koma við tilmæli til landsstýrið um ábøtur, so skjótt til ber, og at landsstýrið leggur kanningarúrslitið og tilmælið fyri fiskivinnunevndina.

Ein minniluti (Juul Jacobsen) viðmerkir:

Vrakieftirlitsmenninir skuldu havt tann besta praktiska kunnleika til hetta mál, og somuleiðis eiga og skulu teir vera óheftir av bátum, virkjum og søluliðinum. Kunnu hesir menn rætta okkurt brekið, sum ikki ger góðskuna verri, og ikki nerva niðanfyri nevndu virkislið ov mikið, so er væl vunnið. Minnilutin setir sostatt fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið áleggur vrakieftirlitsmonnum at hava eftirlit við fiskinum, tá hann kemur upp á land, undir arbeiðinum á virkinum og so vítt gjørligt í søluliðinum.
2. Eftirlitsmenninir ferðast ímillum økini.
3. Eftirlitsmenninir samráðast sínámillum og saman við góðskumetarum um, hvat funnið er fram til, hvat gerast skal og eisini finna fram til eina javnari góðskumeting.

2. viðgerð 9. mai, atkvøðugreiðsla 10. mai. Uppskotið frá Petur Reinert fall við 14-0. Uppskotið frá meiriluta í fiskivinnunevndini samtykt við 24-1, og uppskot frá Juul Jacobsen pkt. 1 fall við 1-0, pkt. 2 og 3 fullu við 2-0.

F.L.j.nr. 1515-24

# 38. Millumbylgjusendari til Útvarp Føroya

Ár 1982, mánadagin 6. december legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at gera neyðugar fyrireikingar til uppseting av nýggjum, sterkari sendara á millumbylgju til Útvarp Føroya.

Samstundis verður álagt landsstýrinum at seta hetta arbeiði í gongd skjótast gjørligt.

**Viðmerkingar:**

Longu frá stovnan av hevur Útvarp Føroya havt ein nógv ov veikan millumbylgjusendara. Nakað varð bøtt um hetta, tá FM-støðirnar vórðu bygdar, men so at siga bert fyri tey, sum lurta á landi í Føroyum. FM-sendararnir hava havt lítlan týdning fyri tann partin av sjófólki okkara, sum hevur roynt undir Føroyum, og púrt ongan týdning fyri hin partin, sum hevur verið á fiskileið aðrastaðni.

Í 1977 legði landsstýrið uppskot fyri tingið um at byggja útvarpinum ein millumbylgjusendara upp á 200 KWT, sum útvarpið tá hevði fingið loyvi til á altjóða ráðstevnu í Genéve. Hetta uppskot varð beint í fíggjarnevndina og kom ikki aftur haðani.

Síðani hevur málið verið umrøtt á tingi og í bløðum, men einki meira hevur hent. Frá landsstýrinum hevur tingið tó fingið at vita, at landsstýrið kannar møguleikarnar fyri at seta ein sendara upp á Skúvanesi, so at nytta kann fáast burtur úr teimum teknisku installatiónunum á gomlu Loran-støðini.

Fiskimenn og útróðrarmenn eru, sum vera man, stak illa nøgdir við hesi viðurskifti. Teir hava tí nú í stórum tali sent tinginum skrivliga áheitan um at fáa bøtt um hesi viðurskifti.

Ein av orsøkunum til, at málið á sinni ikki kom aftur úr fíggjarnevndini segðist vera, at tingmenn hildu ein 200 KW sendara vera ov dýran. Tað ber ivaleyst til at byggja ein minni sendara fyrst, men tó

eigur hesin at muna so væl, at føroyskir útróðrarmenn og fiskimenn á nærleiðum og miðleiðum í minsta lagi altíð hoyra útvarpið væl.

1. viðgerð 13. december 1982. Eftir at uppskot um at beina málið í skúlanevndina fall við 5-0, varð málið beint í fíggjarnevndina, sum 20. januar 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 6. december 1982 og undir 1. viðgerð tann 13. í sm. mán. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur tann 13. januar 1983 havt fundir við Vagn Erik Michelsen, telegrafstjóra (Store Nordiske Telegrafselskab — millumbylgjusendarin) og Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann.

Á nevnda fundinum var millum annað upplýst um ávís teknisk viðurskifti, og varð sagt frá tí serkøna um millumbylgjusendaran, at um nýtslan verður tann sama sum nú, og viðlíkahaldið verður eins og áður, so kann sendarin halda eini 5 ár aftrat, uttan so at stórur ella álvarsligur skaði kemur fyri.

Upplýst var eisini, at telefonverkið og P. & T. hava kannað, hvar best er at seta millumbylgjusendaran, og er økið við Søltuvík tað frægasta, men einki pláss er væl egnað. Skúvanes kann brúkast.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen) vísir á, at tá landsstýrið arbeiðir við málinum, og tá peningur er avsettur til hetta endamál á uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1983/84, verður ikki tikið undir við uppskotinum til samtyktar, og setir nevndi meiriluti einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam og Ove Mikkelsen) tekur undir við uppskoti Tjóðveldisflokksins og vísir á, at eftir tí, sum er upplýst, ber til fyri nakrar fáar milliónir kr. at fáa loyst eina uppgávu, sum áður varð mett at kosta nógvar milliónir kr.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) mælir til, at málið verður sent landsstýrinum saman við áheitanini frá umleið 230 útróðrar- og fiskimonnum um útvegan av sterkari útvarpssendara, og at heitt verður á landsstýrið um at gera nakað við málið.

2. viðgerð 2. februar 1983. Uppskotið til samtyktar fall við 14-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá minniluta í nevnd (Adolf V. Hansen) fall við 11-0 atkvøðum.

# 39. Val av millumtinganevnd til at kanna føroyskar vinnulívsíløgur uttan fyri Føroyar

Ár 1982, mánadagin 6. december legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið velur 5-manna millumtinganevnd, sum skal kanna tær vinnulívsíløgur, sum partvíst við stuðuli frá landsstýrinum eru gjørdar í fyritøkur uttan fyri Føroyar, og eisini tær ætlanir, sum nú eru í umbúna um slíkar íløgur — eitt nú Senegal-projektið — og sum skjótast at leggja úrslitið av hesum kanningum fyri løgtingið.

**Viðmerkingar:**
Vit vita, at eitt vaksandi vinnuloysi er við at taka seg upp, at bygdir avtoftast, at týdningarmikil menningarprojekt liggja á láni, t.d. svartkjaftur, aling og veiða av laksi og skeljadjórum, nýggir veiðuhættir skulu roynast, meira og minni ótroyttir fiskastovnar skulu kannast, stórar ábøtur skulu gerast á íðnaðarvirkjunum, íðnaðarstovnan er skerd niður í bein.

Í hesari afturgongdsmynd hendir so tað, at fíggjarorka okkara — tað lítla ið er eftir av henni — verður nýtt til verkætlanir í útheiminum — ivingarsamar verkætlanir — sum, hóast hesar skuldu eydnast — *ikki* koma at geva okkum vinning — men einans teimum útlendsku risafyritøkunum.

1. viðgerð 27. januar 1983. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 6. december 1982 og undir 1. viðgerð tann 27. januar 1983 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur havt málið til viðgerðar. Robert Poulsen, Fiskasølan, og Pauli Ellefsen, løgmaður, hava greitt marknaðarnevndini frá føroysku vinnulívsíløgunum uttan fyri Føroyar.

Løgmaður hevur lovað marknaðarnevndini nágreiniliga frágreiðing um løgtingsmálið.

Ein samd marknaðarnevnd setir í staðin fyri uppskot Tjóðveldisfloksins fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Marknaðarnevndin kannar tær vinnulívsíløgur, sum partvíst við stuðuli frá landsstýrinum eru gjørdar í fyritøkur uttan fyri Føroyar, og eisini tær ætlanir, sum nú eru í umbúna um slíkar íløgur — eitt nú Senegal-projektið, og ger løgtingið kunnugt við úrslitið.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 106-15

---

# 40. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum DDR til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1983

Ár 1982, mánadagin 13. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu semju dagf. 2. dec. 1982 um sínámillum fiskirættindi í 1983 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

**Viðmerkingar:**

Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvi til at reka svartkjaftaveiðu í føroyskum sjógvi. Frá føroyskari síðu hevur í hesum sambandi dentur verið lagdur á, at svartkjaftastovnurin undir Føroyum hevur kunnað tolað hesa veiðu, at fiskifør úr DDR frammanundan høvdu rikið hesa veiðu á hesum havleiðum, at veiðan varð viðgjørd til mannaføði, og at myndugleikarnir í DDR buðu sær til at geva frá sær vitan um veiðu og hagreiðing av svartkjafti v.m.

Í 1980 byrjaði føroyskur toskafiskiskapur í Eystarasalti, og varð tá sett sum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lýðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp á 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu upp á 6.600 tons av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið hjá DDR varð samstundis hækkað úr 2 í 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroyingum hækkað úr 3 í 5. Av kvotuni upp á 800 tons av toski kundu 400 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 600 tons av sild.

Í 1982 fingu føroyingar eina kvotu upp á 975 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu upp á 8000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av tí hækkaðu kvotuni kundu 500 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 750 tons av sild. Talið av føroyskum skipum varð samstundis hækkað úr 5 í 7.

Á fundi í Keypmannahavn tann 2. december 1982 ímillum umboð fyri Føroya landsstýri og danska uttanríkismálaráðið øðrumegin og umboð fyri fiskivinnumyndugleikarnar hjá DDR hinumegin varð

funnið fram til hjáløgdu semju um sínámillum fiskiskap millum Føroyar og DDR fyri 1983.

Sambært hesa semju verður kvotan av svartkjafti til DDR hækkað úr 8.000 tonsum í 10.000 tons. Loyvda skipatalið varð hækkað úr 3 í 4.

Føroyska toskakvotan verður samstundis hækkað úr 975 tonsum í 1300 tons. Av hesi kvotu kunnu 650 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Talið av føroyskum skipum verður samstundis hækkað úr 7 í 10.

Semja var um, at fiskiskapur hjá báðum pørtum kann byrja 1. januar 1983.

Partarnir vilja royna at gjøgnumføra notuskifti áðrenn 1. februar 1983 og at byrja samrøður um sínámillum fiskiskap í 1984 ella í longri tíðarskeið í oktober 1983.

*skjal 1*

**Protokoll**

millum umboðsmenn fyri danskar og føroyskar myndugleikar øðrumegin og umboðsmenn fyri VEB Fischkombinat Rostock hinumegin um fiskiveiðu í árinum 1983.

Sendinevndirnar eru komnar ásamt um at leggja niðanfyri standandi uppskot fram fyri myndugleikar teirra til góðkenninar:

1. VEB Fischkombinat Rostock fær í árinum 1983 eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti á landleið Føroya.
2. Føroyar fáa á landleið DDRs í 1983 eina kvotu uppá 1.300 tons av toski. Harav kunnu í staðin fyri upp til 650 tons av hesi toskakvotu veiðast upp til 975 tons av sild.
3. Talið av skipum, sum kunnu veiða hesa kvotu á landleið Føroya, er avmarkað til fýra før.

   Føroyar kunnu til veiðu av kvotuni á landleið DDRs nýta tíggju før.
4. Partarnir royna at fáa í lag notuskifti til váttan av sáttmálunum um fiskiskap í 1983 áðrenn 1. februar 1983. Partarnir eru samdir um, at sínámillum fiskiskapurin kann byrjast tann 1. januar 1983.
5. Partarnir halda tað vera hóskandi at miða ímóti einari samráðing

um sínámillum fiskiskapin í 1984, ella fyri eitt longri tíðarskeið, í oktober 1983.

Keypmannahavn, tann 2. december 1982

P.E. H.B.

1. viðgerð 15. december 1982. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 41: Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1983 og nr. 43: Fyribilsskipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið, og vórðu málini beind í marknaðarnevndina, sum 17. december legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 13. december 1982 og undir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Guttorm Klein, Jógvan Sundstein, Svend Åge Ellefsen, Jørgen Thomsen og Agnar Nielsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur hesa viðmerking:

Heitt verður á landsstýrið um at hava vakið eyga við, at svartkjafturin økist í virði, og at lutfallið tí má batna samanborið við anuan fisk.

Annars eigur landsstýrið at hava eitt vakið eyga við støddunum av teimum kvotum av svartkjafti, ið verða latnar øðrum.

Minnilutin (Petur Reinert og Hans Marius Joensen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 17. december. Uppskot landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-3/82

# 41. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1983

Ár 1982, mánadagin 13. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NAFO-ársfundinum í september 1982 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1983.

**Viðmerkingar:**
Á 4. regluliga ársfundi í NAFO, hildin í Halifax, Nova Scotia, 13.-17. september 1982 var tilráðingin frá vísindaliga ráðnum, at mælt skuldi vera frá beinleiðis fiskiskapi eftir toski á Flemish Cap í 1983, við tað at stovnurin framvegis var minkandi.

Føroyar, saman við Noreg og Portugal, kundu ikki taka undir við einum toskabanni á hesum øki.

Føroyska sendinevndin setti tí fram uppskot um at halda fram við somu skipan sum í 1982. Fyri hesum uppskoti greiddu 4 lond atkvøðu, Føroyar, Noreg, Portugal og Póland, EEC ímóti. Tað føroyska uppskotið var sostatt samtykt, og føroyska toskakvotan á Flemish Cap, NAFO øki 3 M verður sostatt 2.900 tons eins og í 1982.

Føroyingar veiða eisini árliga nakað av toski á øki 3 NO. Eingin kvota verður her serstakliga tillutað føroyingum, men vit hava seinastu árini veitt av hesi kvotu, tillutað øðrum (»others«).

Kvotan í síni heild var eins og í 1982 sett til 700 tons.

Víst verður til hjálagda skjal 1.

# *Schedule I*

*Quota Table[1] for Year 1983*[6&7]

## SCHEDULE I Quota Table[1] for Year 1983[6&7]

| Column I | II | III | IV | V | VI | VII | VIII | IX | X | XI |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Contracting Party | Cod | Cod | Redfish | Redfish | American plaice | American plaice | Yellow-tail | Witch | Capelin | Squid *(Illex)* |
| | Div.3M | Div.3NO | Div.3M | Div.3LN | Div.3M | Div.3LNO | Div.3LNO | Div.3NO | Div.3NO | Subareas 3+4[4&5] |
| 1. Bulgaria | - | - | 300 | - | - | - | - | - | - | 500 |
| 2. Canada | 100 | 10,800 | 2,000[9] | 12,000 | 250 | 54,200 | 18,535 | 3,000 | - | N.S.[8] |
| 3. Cuba | 480 | 850[3] | 1,550 | 2,250 | - | - | - | - | - | 2,250 |
| 4. European Economic Community | 2,405 | 210 | 1,200 | - | - | 700 | 380 | - | - | N.S.[8] |
| 5. Faroe Islands (Denmark) | 2,906 | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 6. German Democratic Republic | - | - | - | 850 | - | - | - | - | - | - |
| 7. Iceland | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 8. Japan | - | - | 400 | - | - | - | - | - | - | 2,250 |
| 9. Norway | 1,200[7] | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 10. Poland | 500 | - | - | - | - | - | - | - | - | 1,000 |
| 11. Portugal | 3,500 | 1,100 | 600 | 850 | 250 | - | - | - | - | 500 |
| 12. Romania | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 500 |
| 13. USSR | 1,270 | 3,340 | 13,850 | 8,900 | 1,000 | - | - | 1,950 | - | 5,000 |
| 14. Others | 50 | 700 | 100 | 150 | 500 | 100 | 85 | 50 | - | - |
| 15. Special Reservation[2] | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 16. Total Allowable Catch | 12,405 | 17,000[6] | 20,000 | 25,000 | 2,000 | 55,000 | 19,000 | 5,000 | 0 | 150,000 |

[1]Quotas are in metric tons.

[2]There are no Special Reservations for 1983.

[3]This allocation is transferred to Canada for 1983.

[4]The opening date for the squid *(Illex)* fishery is 1 July.

[5]Any quota listed for squid may be increased by a transfer from any »coastal state« as defined in Article 1, para. 3 of the NAFO Convention, provided that the TAC for squid is not exceeded. Transfers made to Contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the Report shall be made as promtly as possible.

[6]TAC shall not be increased until such time as the Scientific Counsil reports that age 3+ annual mean biomass has reached 200,000 metric tons.

[7]465 tons of this allocation represent a supplementary allocation to ensure participation by two Norwegian vessels in this fishery. This supplementary allocation shall not be taken into account in alloctions for future years.

[8]Not Specified because the allocations to these Contracting Parties are as yet undetermined, altough their sum shall not exceed the difference between the total of allocations to others Contracting Parties and the TAC.

[9]Includes 850 M.T. transferred to Cuba for 1983.

1. viðgerð 15. december 1982. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 40: Loyvi til DDR at fiska svartkjaft á føroyskum øki, og nr. 43: Fyribilsskipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið. Málini vórðu beind í marknaðarnevndina, sum legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 13. december og undir 1. viðgerð 15. december beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 17. december. Uppskot landsstýrisins samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L. 1519-20

---

# 42. Umlegging av skattaskipanini til samtíðarskatt

Ár 1982, mánadagin 13. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið fyrireikar uppskot at leggja fyri løgtingið um umlegging av landsskatti og kommunuskatti til samtíðarskatt frá 1. januar 1984 eftir hesum høvuðsreglum:

1. Fyribilsskattur fellur til gjaldingar, so hvørt og samstundis sum A-inntøka er fallin til gjaldingar,
2. A-inntøkur skulu, áðrenn tær verða goldnar, verða fluttar um stovn, góðkendur av landsstýrinum til afturhald av skatti.
3. Fyribilsskatturin verður roknaður eftir kulmulativari skipan.

4. Afturhildni fyribils skatturin er grundaður á upplýsingar í eini forskotsskráseting um m.a. ætlaðar B-inntøkur og skattligan frádrátt.
5. Endalig álíkning fer fram, tá álmanakkaárið er úti. Líkningin hevur sum grundarlag tær í skattaskráunum savnaðu upplýsingar og sjálvgivnar upplýsingar um B-inntøkur og skattligar frádráttir fyri roknskapar- ella bókhaldsskyldug innsendar roknskapir.
6. Líkningin úti í kommununum verður nýskipað á tann hátt, at líkningarnevndir verða skipaðar fyri større øki umfatandi fleiri kommunur. Landsstýrið skipar fyri fyrisitingini í fyrisitingarligu eindunum.
7. Í sambandi við umleggingina verða ávísar yvirgangsreglur gjørdar so sum:

a) av álíkningini 1983/84 verður álíknaði skatturin fyri januar ársfjórðing 1984 strikaður.
b) um framferðarháttur við uppgerð av inntøku í 1983 verður broyttur í mun til undanfarin ár, verður tann flutta inntøkan skattað við serstakari likning og
c) meirinntøka skattgjaldari forvinnur í 1983, í mun til inntøkuna í 1984 ella 1982 hækkað við ávisum prosenttali, verður skattað við serstakari líkning.

**Viðmerking:**

Tankin um at seta í verk samtíðarskatt her á landi er ikki nýggjur.

Í apríl 1961 legði Tjóðveldisflokkurin uppskot á ting um kelduskatt. Málið var eftir tilmæli skattanevndarinnar beint í eina 5-manna millumtinganevnd, sum sett varð at evna til eina nýggja skattalóg.

Men tá ið uppskotið til hesa lóg kom á ting í mars 1963, var samtíðarskattaskipanin ikki við. Skattalógin frá 1963 er galdandi enn.

Tað landsstýrið, sum var undan hesum, broytti skattalógina til tess at laga hana til ein komandi samtíðarskatt. M.a. var fyriskipað lutvísur bruttoskattur og serskatting av hjúnum.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur, at arbeitt skal verða fram ímóti einum einfaldum samtíðarskatti.

Landsstýrið fór beinan vegin í holt við hetta stórarbeiðið, sum nú er komið so langt, at lógaruppskot er um at vera tilevnað.

Nú er samtíðarskattur sum so bert ein annar innkrevjingarháttur enn tann, vit nýta í dag. Men heldur enn at koma við broytingum til galdandi skattalóg, sum áður hevur verið broytt so mangan, er gjørt

uppskot til nýggja skattalóg.

Áðrenn uppskotið verður lagt fyri tingið, verður hildið beinast, at tingmenn fáa høvi til at taka støðu til nakrar høvuðstættir í uppskotinum eins og til ta skipan, sum skal galda fyri árið 1983, sum verður hitt seinasta undir núgaldandi skattalóg.

Tessvegna hjálagda uppskot til samtyktar.

*Ad 1.* Talan er bert um sonevndar A-inntøkur. Hvørjar hesar eru, verður at tilskila gjøllari í lógini, talan verður um lønir, eisini eftirlønir, fólka- og avlamispensjón, hýrur o.t.

Her verður lagt fast, at skatturin er fallin til gjaldingar, samstundis sum lønin er fallin, og ikki sum nú, har skatturin fellur til gjaldingar eftir eini skattarokning til ávísar gjalddagar.

*Ad 2.* Eftir galdandi lóg hava arbeiðsgevarar o.t. bert skyldu til at eftirhalda og avrokna falnan skatt eftir kravi frá skattamyndugleikunum í hvørjum einstøkum føri. Eftir nýskipanini er talan um, at arbeiðsgevarin fær skyldu til at afturhalda skattin í lønini, samstundis sum lønin er fallin til gjaldingar. Hetta er tann skipanin, ið er galdandi í hinum Norðanlondunum, ið hava lagt um til kelduskattaskipan. Umleggingin hevur ført við sær, at tað ikki er óvanligt, at arbeiðsgevarar ikki rættstundis avrokna falnan skatt og tí koma í eftirstøðu, rættiliga stórar eftirstøður.

At sleppa sum mest undan hesum eftirstøðum verður tann skylda løgd á arbeiðsgevaran afturat, at hann skal flyta bruttolønina til stovn, landsstýrið góðkennir til at afturhalda og avrokna skattin. Landsstýrið ger avtalu í fyrsta umfari við peningastovnarnar, bankar og sparikassar um at taka ímóti lønini, afturhalda skatt og at avrokna skattin. Í avtaluni verður tikið fyrivarni um, at aðrir stovnar, eitt nú postverkið, gjaldstovan og møguliga eisini tær størru løngjaldsstovurnar, kunnu koma upp í skipanina.

Teir góðkendu stovnarnir binda seg til í samsvari við lóggávu, kunngerðir og sáttmála at taka ímóti øllum inngjøldum av A-inntøkum, afturhalda skattin til Føroya Gjaldstovu og samstundis útgjalda nettoinntøkuna til útgjaldaran ella eftir avtalu beinleiðis til løntakaran.

Skipanin verður so hon, at arbeiðsgevarin flytir bruttolønina til ein góðkendan stovn, samstundis sum upplýst verður navn, bústaður, persónnummar, bruttoløn og tíðarskeið, har lønin er forvunnin. Hesar upplýsingar verða sendar til skattaskránna, har skatturin verður útroknaður, stovnurin fær boð um skattaupphæddina, sum skal afturhaldast.

Stovnarnir skulu í seinasta lagi tveir fullar arbeiðsdagar eftir, at út-

gjaldarin hevur tøkan pening svarandi til lønarlistan, afturhalda skattin til Føroya Gjaldstovu og samstundis flyta útgjaldaranum ella eftir avtalu løntakaranum nettolønina.

Skattaskráin er ogn skattavaldsins, men verður fyrisitin av einum EDV-felag. Í hesum verða allar upplýsingar um lønir og afturhildnan skatt fyri hvønn einstakan skattaborgara goymdar. Við árs enda hevur skattaskráin upplýsingar um samlaðu inntøku og tann afturhildna skattin fyri árið hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara, og verða hesar upplýsingar uýttar gjøgnum árið til útrokning av fyribilsskatti og somuleiðis í sambandi við endaligu álíkningina árið eftir.

Í serstøkum føri skal ein persónur kunna fara til ein peningastovn við einum sokallaðum »løuarkekki«, sum beinleiðis kann útgjaldast av einum peningastovni. Í slíkum føri kundi ein skipan hugsast, soleiðis at helvtin verður afturhildin í skatti, og restin verður flutt skattgjaldaranum.

*Ad 3.* Høvuðsreglan í tí sokallaðu kumulativu skattaútrokningini er, at fyri hvørja einstøku útgjalding av A-inntøku fer fram ein verulig skattaútrokning, t.v.s. funnið verður fram til tann »rætta« skattin, tann einstaki skattgjaldarin skal gjalda, tá seinasta lønútgjaldingin verður løgd afturat teirri higartil forvunnu A-inntøku í árinum. Tann útroknaða skattaupphæddin verður samanborin við higartil í árinum afturhildnan skatt, og munurin verður sostatt at afturhalda í seinastu lønútgjalding. Viðmerkjast skal her, at allar upplýsingar, sum tørvur er á, fyri at henda skattaútrokning kann fara fram, mugu finnast í forskotsskrásetingini fyri tann einstaka skattgjaldaran, t.v.s. umframt samanløgdu upphæddir fyri A-inntøkur og afturhildnan skatt, eisini upplýsingar viðvíkjandi mettari B-inntøku, mettum frádráttum og harumframt aðrar upplýsingar, so sum persónsfrádráttur og kommunuskattaprosent.

Útrokning av skatti eftir tí kumulativu skattaskipanini hevur víst seg at rigga heilt væl, samanborið við aðrar afturhaldsskipanir, tað vísa royndirnar, ið gjørdar eru í arbeiðinum við uppskotinum til nýggju skattalógina. Somuleiðis vil vanliga hvørki restskattur ella ov mikið goldin skattur koma undir ta fortreyt, at samsvar er millum mettu og veruligu upphæddirnar fyri B-inntøkur og frádráttir. Tað er tó í ávísum førum, har neyðugt verður at tillaga ella broyta afturhaldsskipanina, t.d. har skattgjaldarin verður pensióneraður ella fer úr arbeiði.

*Ad 4.* Ætlanin er at fremja eina skipan, har minst møguligar eftirreguleringar av skatti verða, tó er at siga, at ein endaligur kelduskattur er ikki í nakrari kelduskattaskipan um okkara leiðir.

Skattgjaldarin verður at gjalda forskotsskatt á henda hátt:

1. A-skattur av lønarinntøkum v.m. gjøgnum afturhaldsskipanina.
2. B-skattur fyri vinnurekandi v.m. við skattauppkrevjing.

Endamálið er, at forskotsskatturin er so nær tí endaliga skattinum sum gjørligt.

Forskotsskrásetingin inniheldur upplýsingar um persónnummar, navn, yrki, skattakodu, barnatal og kommunukodu, ætlaðar inntøkur og frádráttir.

Inntøkurnar verða býttar sundur í A-inntøkur og B-inntøkur. Sum A-inntøkur verða skrásettar sum fyrr nevnt, t.d. vanligar lønarinntøkur, pensiónir og eftirlønir. Sum B-inntøkur verða skrásettar t.d. allar inntøkur av fríari vinnu, landbúnaði, skattskyldugar rentur, fríir ágóðar og húsaleiga.

Forskotsskráseting fer fram á tann hátt, at inntøkuviðurskiftini í 1982 verða løgd til grund fyri forskotsskránna í 1984, um samtíðarskattur verður framdur frá 1. januar 1984.

Í slíkum førum, har inntøkuviðurskiftini ella onnur viðurskifti, sum hava skattligan týdning, eru broytt, kann skattgjaldarin, áðrenn 1984 byrjar, senda nýggjar upplýsingar til forskotsskattaskránna. Eisini kunnu hesar upplýsingar gevast í árinum 1984, fyri at forskotsskatturin verður so væl í samsvari við endaliga skattin sum gjørligt.

*Ad 5.* Tá árið er úti, hevur líkningarvaldið upplýsingar um samanlagdar A-inntøkur hjá øllum skattgjaldarum. Hetta merkir, at øll, sum bert hava A-inntøku, bert á sjálvuppgávuni fyri farna álmanakkaárið skulu vátta tær av líkningarvaldinum innsavnaðu upplýsingar um A-inntøku og afturhildnan skatt. Harumframt fáa skattgjaldararnir høvi til at upplýsa yvir fyri skattavaldinum veruligar upphæddir fyri teir frádráttir, sum hesir skattgjaldarar meta seg hava rætt til fyri farna ár.

Allir her nevndu vanligu skattgjaldarar, sum oftast bert hava lønarinntøku og rentur til frádrátt, skulu helst verða líknaðir áðrenn 1. juni, so hesir kunnu fáa teirra ov nógv goldna skatt aftur so skjótt sum gjørligt. Ov lítið goldin skattur verður uppkravdur við serstakari uppkrevjing, ella, har talan er um smærri upphæddir, við yvirflyting til næsta ár.

Teir persónar, sum hava roknskaparskyldu, mugu bíða við at fáa skattin javnaðan, til roknskapirnir eru fyribils góðkendir, og verður so ein útgjalding ella inngjalding av skatti undir teirri treyt, at skattauppgerðin jú kann broytast við eini seinri meiri nágreiniligari kanning av roknskapinum. Í hesum sambandi verður ein álíkningarskrá gjørd, sum hevur upplýsingar um álíkningina, so hesar kunnu nýtast til for-

skotsskráseting ina.

Leggjast skal afturat her, at skattskyldug feløg framvegis verða líknað og gjalda skatt á sama hátt sum higartil, t.v.s. við eini álíkning við inntøkuni í farna inntøkuári sum grundarlag.

*Ad 6.* Ein fortreyt fyri, at umleggingin til samtíðarskatt kann virka eftir ætlan, er at størri fyrisitingarligar eindir verða skipaðar í sambandi við forskotsskráseting ina, álíkningina og við fyrisiting av einum arbeiðsgevaraeftirliti.

Hetta kann verða gjørt á tann hátt, at líkningarnevndir verða skipaðar fyri økir, ið fevna yvir fleiri kommunur. Í nevndunum verða minst eitt umboð frá hvørjari kommunu. Umboðini verða vald av kommunustýrunum.

Til ta dagligu fyrisitingina hjá hesum nevndum setir líkningarráðið starvsfólk frá ráðnum, m.a. til at taka sær av øllum spurningum forskotsskráseting ini viðvíkjandi.

Her er einamest hugsað um tað arbeiði, sum loypandi fer fram í árinum við at skráseta tilflytarar, broyta samb. fráflytingar, broytingar í sambandi við giftu, deyða og minkandi inntøkur vegna sjúku ella aldur, broyting av útreiðsluupphæddum vegna lántøku o.t.

Líkningarnevndirnar koma eins og nú at hava ábyrgdina av endaligu álíkningini, og er tá tann dagligi fyrisitingarligi leiðarin skrivari hjá nevndini.

Til at standa fyri eftirltinum við arbeiðsgevarum verður skipað eitt arbeiðsgevaraeftirlit, ið verður stýrt frá líkningarráðnum. Ráðið setir serútbúgvið fólk, ið hevur ábyrgdina av arbeiðsgevaraeftirlitinum.

Tann fyrisitingarligi dagligi leiðarin í líkningarnevndunum kemur tó at taka sær av tí regluliga samstarvinum við arbeiðsgevararnar, t.v.s. hann hjálpir arbeiðsgevarunum í økinum at fáa skipanina at virka og er leiðbeinandi og upplýsandi stovnur í økinum.

*Ad 7a.* Neyðugt verður at broyta útskrivingina av álíknaða skattinum fyri skattaárið 1983/84 soleiðis, at 75% av ársskattinum hjá tí einstaka skattgjaldaranum eru fallin til gjaldingar, tá almanakkaárið 1983 er komið at enda.

Skotið verður upp, at talið av ratum og gjaldsfreistum fyri tíðarskeiðið apríl 1983 til og við december 1983 ikki verður broytt, men at hvør av teimum 7 ratunum verður hækkað við ávísari upphædd, soleiðis at samlaða upphæddin kemur upp á nevndu 75% av ársskattinum.

*Ad 7b.* Her er talan um reglur, sum hava til endamáls at avmarka møguleikan hjá tí einstaka persónliga skattgjaldaranum, sum hevur roknskapar- ella bókhaldsskyldu, við roknskaparligum tiltøkum at

flyta inntøku til álmanakkaárið 1983.

Henda flyting av inntøku kann koma fyri á ymiskan hátt. T.d. kann skattgjaldari við at avskriva við einum lægri prosenttali í roknskapinum fyri 1983, enn gjørt hevur verið árini frammanundan, fáa eina lutfalsliga hægri inntøku hetta árið.

Somu møguleikar fyri at fáa eina lutfalsliga høga inntøku í 1983 liggja t.d. í eini broyting av háttinum, sum hevur verið nýttur til uppgerð av vørugoymslu, arbeiðum í gerð og debitorum — bert fyri at taka nøkur dømi.

Leggjast skal afturat, at flutt inntøka ikki bert kann koma fyri hjá roknskapar- ella bókhaldsskyldugum einstaklingum, men eisini t.d. hjá løntakarum, sum fáa serstakar samsýningar frá arbeiðsgevara v.m. í 1983, ella í sambandi við serligar (lønar)útgjaldingar til høvuðspartaeigara.

Tað, sum í hesum førum verður skattað við serstakari álíkning eftir reglum og stigum galdandi fyri skattaárið 1983/84, er tann sokallaða flutta inntøkan.

Við fluttari inntøku verður her meint munurin millum inntøkuna hjá skattgjaldaranum sambært roknskap og sjálvuppgávu í 1983, men gjørda upp eftir higartil galdandi framferðarhátti og sjálvuppgivnu skattskyldugu inntøkuni fyri nevnda álmanakkaár. Bert tann parturin av fluttu inntøkuni, sum er størri enn 25.000 kr., verður tó skattaður.

*Ad 7c.* Hóast inntøkan í 1983 vanliga ikki verður nýtt til álíkning av skatti, so kunnu persónligir skattgjaldarar tó koma út fyri at svara skatt av einari meirinntøku, teir forvinna í hesum ári sæð í mun til inntøkuna í næstfylgjandi — ella undanfarna ári.

Meirinntøkan er tann upphædd, inntøkan í 1983 gjørd upp eftir reglunum fyri skattskyldugari inntøku fer upp um eina ávísa upphædd.

Henda upphæddin er tann hægra av skattskyldugu inntøkunum í 1984 ella 1982 hækkað við 30.000 kr. fyri leysar persónar og 50.000 kr. fyri hjún. Fyri hjún verður roknað við samanløgdu skattskyldugu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Meirinntøkan verður skattað við einum føstum prosenttali, t.d. 40%.

1. viðgerð 15. december 1982. Eftir at uppskot um at beina málið í serliga 6-mannanevnd fall við 5-0, varð málið beint í skattanevndina, sum 19. jan. 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt 13. december 1982 og undir 1. viðgerð tann 15. í sama mánaði beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur á fundi tann 12. í hesum viðgjørt málið.

Á hesum fundi møttu:

Tórbjørn Poulsen, fíggjarmálaráðharri, og Eyðun á Rógvu Olsen, stjóri á Líkningarráðnum, sum svaraðu spurningum frá nevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) tekur undir við, at pkt. 6 skal verða orðað soleiðis:

»Líkningin úti í kommunum verður varðveitt eftir somu skipan sum nú. Settar verða á stovn fyrisitingarligar skrivstovur fyri størri øki umfatandi fleiri kommunur.

Sami meiriluti tekur annars undir við uppskoti landsstýrisins.

Tá minnilutin (Vilhelm Johannesen) fekk boð um, at fundur skuldi verða í løgtingsins skattanevnd mikudagin 12. januar, helt hesin, at hetta fór at vera tann fyrsti av fleiri fundum um tann týdningarmikla samtíðarskattaspurningin. Umboð Javnaðarfloksins hevði ta fatan, at eitt so stórt og týdningarmikið mál sjálvandi fór at fáa eina scra gjølliga viðgerð á fleiri fundum í nevndini og somuleiðis á fleiri fundum millum nevndina og teir ymisku partarnar í málinum. Men á hesum eina fundinum, sum vardi í fimm korter, gjørdist hesin minniluti greiður yvir — og ikki sørt bilsin yvir, at ætlan meirilutans bert var at halda tann eina fundin.

Stjórin á líkningarráðnum var við, og eisini varð landsstýrismaðurin í skattamálum boðsendur, og møtti hesin upp undir endan av fundinum. Sum greitt er frá í álitinum frá meirilutanum, var nevndin samd við landsstýrið viðvíkjandi høvuðsreglu 1, 3, 4, 5 og 7. Viðvíkjandi høvuðsreglu 6 var nevndin samd um at broyta landsstýrisuppskotið soleiðis, at hóast fyrisitingarligu eindirnar verða skipaðar kring landið, skulu kommunalu líkningarmyndugleikarnir hava sama leiklut sum higartil. Hetta er í samsvar við støðuna hjá Føroya Kommunufelag.

Hin vegin var nevndin ikki samd um høvuðsreglu 2. Tað er hendan, sum ásetir, at peningastovnarnir og eitt privat datafelag, sum peninga-

stovnarnir eiga saman við tryggingarsambandinum, í rættiliga stóran mun skulu umsita nýggju skattaskipanina. Meirilutin tók sum kunnugt undir við uppskoti landsstýrisins. Í sambandi við høvuðsreglu 2 førdi umboð Javnaðarfloksins fram, at Tryggingarsambandið Føroyar, ið var ein av stovnarunum av tí privata datafelag, og sum framvegis er partaeigari, ikki longur nýtir hetta datafelag, men koyrir á sínum egnu datatólum, og tí bað umboð Javnaðarfloksins um, at skattanevndin boðsendi stjóranum á tryggingarsambandinum, soleiðis at nevndin kundi fáa eina frágreiðing um orsøkina til hetta. Úrslitið av hesum varð, at umboð Javnaðarfloksins saman við formanninum í skattanevndini kundi fáa høvi til at tosa við stjóran á tryggingarsambandinum dagin eftir. Tað er vert at undirstrika, at skattanevndin sum so als ongan áhuga hevði fyri at hoyra um orsøkiruar til, at tryggingarsambandið nú koyrir á egnum datatólum.

Umboð Javnaðarfloksins spurdi eisini, um tað er rætt, at ein avgreiðsla hjá tí privata datafelagnum kostar munandi meira, enn t.d. ein avgreiðsla kostar á egnum datatólum hjá ávísum almennum stovnum. Javnaðarflokkurin ynskti at vita, hvat tað kemur at kosta tí almenna at nýta tað privata datafelagið í sambandi við samtíðarskattin. Hetta førdi til, at landsstýrismaðurin í skattamálum varð boðsendur. Hesin endurtók í fullum álvara, at kostnaðurin fór at verða 0 kr. Hesum var stjórin á líkningarráðnum kortini ikki samdur í. Stjórin visti tó ikki, hvussu stórur kostnaðurin fór at verða. Út frá hesum ásannar umboð Javnaðarfloksins, at annaðhvørt vita ábyrgdarmenn í umsitingini og í landsins fremstu politisku sessum alt ov lítið um hetta stóra og týdningarmikla mál, ella er talan um eitt óhugnaligt myrkaspæl, sum hevur til endamáls at fremja eina totala elektroniska valdtøku av almenninginum og samfelagnum.

Tá umboð Javnaðarfloksins spurdi landsstýrismannin, um tað ikki var møguligt hjá skattanevndini at fáa eitt eintak av einum uppskoti til samarbeiðssáttmála við datafelagið, varð svarað, at nakað tílíkt enn ikki er gjørt og ikki kann verða gjørt, fyrr enn løgtingið hevur samtykt uppskotið til samtyktar í løgtingsmáli nr. 42. Við øðrum orðum skal løgtingið keypa eina vøru uttan at hava minsta ánilsi um prís, dygd ella innihald. Hetta er ein formur fyri bóndafangarí, sum Javnaðarflokkurin á ongan hátt kann taka undir við, men vil flokkurin harðliga átala hesa mannagongd. Var nakað høpi í, høvdu endalig uppskot til sáttmálar við datafelagið, peningastovnarnar og aðrar stovnar, sum partarnir høvdu skrivað og bundið seg til, treytað av løgtingsins góðkenning, ligið við í hesum máli sum fylgisskjøl, men

her er eingin stavur, og tað, sum verri er, her eru heldur eingi tøl.

Tað er hesum minniluta kunnugt, at landsfólkayvirlitið koyrir á dataskipanini hjá pf. Elektron, og út frá hesum skuldu bæði menn í umsitingini og landsstýrismaðurin, sum hevur hesi mál um hendi, havt eina hylling á, hvat kostnaðurin er fyri eina avgreiðsla. Hvat kostar eitt uppkall frá landsfólkayvirlitinum til Elektron? Kostar tað 0, sum landsstýrismaðurin sigur, ella kostar tað 5 oyru, 33 oyru ella 1 kr.? Hvat kostar tað landsfólkayvirlitinum, at ein persónur kemur á stovnin og ynskir at vita, hvat er skrásett um viðkomandi? Er tað veruliga so galið her í landinum, at eingin kann svara spurningum sum hesum? Er tað eingin, sum veit, ella er hetta eitt loyndarmál, sum hvørki tingið ella almenningurin má vita nakað um? Nær hevur landsfólkayvirlitið fingið loyvi at koyra á Elektron, og hvør hevur givið hetta loyvi? Hvar er sáttmálin millum landsfólkayvirlitið og Elektron, og hvat stendur í honum?

Síðani til fundin við stjóran á tryggingarsambandinum. Umboð Javnaðarfloksins gav somu frágreiðing og setti somu spurningar, sum settir vórðu á fundinum í skattanevndini dagin fyri. Stjórin greiddi frá, at tryggingarsambandið í 1982 hevði spart umleið 1 mió. kr. við at koyra á egnum datatólum. Um orsøkina til, at tað var ov dýrt hjá tryggingarsambandinum at koyra á dataskipanini hjá Elektron, segði stjórin, at avgreiðslurnar hjá tryggingarsambandinum kravdu fleiri útrokningar enn t.d. avgreiðslurnar hjá peningastovnunum. Hann nevndi sum dømi útrokningar, tá ein bilur verður skrásettur. Javnaðarflokkurin heldur, at ein og hvør, uttan at vera serfrøðingur á økinum, dugir at síggja, at skattgjaldarar, sum skulu setast í skatt eftir kumulativu skipanini — summir enntá eina ferð um vikuna — krevja uppaftur fleiri útrokningar enn ein bilur, tá hesin verður skrásettur ta einu ferðina. Umboð Javnaðarfloksins í skattanevndini hevur kortini sett seg í samband við fólk, sum hava kunnleika til hesi viðurskifti, og hevur hesin fingið viðhald í, at talið av útrokningum er fleiri ferðir tað, sum eitt tryggingarmál krevur.

At finna fram til nøkur verulig og álítandi tøl í hesum máli tykist at vera eins torført sum at finna eina nál í eini des. Menn í umsitingini vita lítið og einki. Menn, sum sita í landsins fremstu politisku sessum, vita enn minni. Í fíggjarlógaruppskotinum eru nøkur eftir Javnaðarfloksins tykki rættuliga ivasom og trølslig tøl. Fyri komandi fíggjarár verður mett, at samtíðarskattaskipanin skal hava 7,4 mió. kr. Og hetta uttan at sáttmáli er skrivaður við datafelagið. Skulu vit trúgva hesum, ella skulu vit trúgva landsstýrismanninum, sum ferð eftir ferð sigur, at

kostnaðurin verður 0 kr.? Eisini verður sagt, at Líkningarráðið skal hava stívliga 1 mió. kr. eyka, og at gjaldstovan skal hava umleið 2 mió. kr. eyka. Her eru samanlagt 10 mió. kr., sum helst allar óbeinleiðis og beinleiðis fara til samtíðarskattaskipanina. Komandi fíggjarár er sjálvandi tað dýra árið við nógvum eingangsútreiðslum. Men taka vit so metingar landsstýrisins fyri fíggjarárið 1985/86, tá samtíðarskattaskipanin koyrir í sínum næsta ári, er talið 768.000 kr. (Vit skulu framvegis hava í huga, at eingin sáttmáli er skrivaður, og at landsstýrismaðurin sigur kostnaðin at vera 0 kr.) Men tá vit so hava í huga, at tryggingarsambandið í 1982 spardi umleið 1 mió. kr. við at koyra á sínum egnu datatólum, so ljóðar hetta talið heilt burturvið, fyri ikki at siga vitleyst, at øll samtíðarskattaskipanin í 1985/86 bert skal kosta 768.000 kr. ella umleið 75 pst. av tí, sum tryggingarsambandið hevur spart eftir einum ári. Her má vera ein roknifeilur í hjá onkrum.

Tá løgtingsmál nr. 42 var til umrøðu á tingi, vildi framsøgumaður Javnaðarfloksins ikki pástanda, at hetta mál var framlagt uppá kvamsvís, men tó gjørdi hann vart við, at eitt og annað kortini bendi á, at málið varð framlagt og viðgjørt uppá kvamsvís. Í dag er Javnaðarflokkurin fullvísur í, at alt hetta er uppá kvamsvís. Sambært viðmerkingarnar frá landsstýrinum var endamálið við uppskotinum, at løgtingið skuldi staðfesta nakrar høvuðsreglur, sum síðani skuldu verða grundarlagið hjá landsstýrinum, tá sjálvt lógaruppskotið skuldi evnast til. Á fundinum í skattanevndini kom fram — av óansni samgongunnar — at umboðini hjá samgonguflokkunum í skattanevndini longu fyri jól høvdu fingið lógaruppskotið í fullum orðaljóði. Formaðurin í skattanevndini hevði tað hjá sær og kom við tí burtur úr taskuni. Eisini kann verða nevnt, at sambært fylgisskjølini til fíggjarlógini verður longu arbeitt við hesum máli uttan nakra heimild frá løgtinginum. Hetta kemur týðuliga til sjóndar á síðunum 24, 25 og 26 í fylgisskjølunum. Á síðu 24 stendur millum annað: »Uppstilling yvir útreiðslur til útviklingsarbeiði í tíðarskeiðinum frá 01.11.82 til 31.03.83.«

Sostatt er sannleikin helst tann, at lógarsmíðið longu var liðugt, áðrenn hetta uppskotið til samtyktar varð framlagt. Arbeitt hevur verið í fleiri mánaðir við hesi samtíðarskattaskipan — og fyri eina stóra upphædd — alt uttan løgtingsins vitan og heimild. Hetta metir umboð Javnaðarfloksins at vera politiskt óreiðiligt og heldur tað vera í so grovt, at ein landsstýrismaður ber seg so rangvørgt at, tá hann fær seg til at festa slíkt á blað og seta sítt navn undir. Var alt hetta ein framførsla av tí lættara slagnum, høvdu fólk helst stuttleikað sær óført,

men tíverri er tað eitt álvarsmál, ið fær hesa ófatiligu viðferð, sum er ein blandingur av skemti, trølsligum tølum, óálítandi upplýsingum og myrkaspæli, har hetta høga og aldargamla ting føroyinga verður hildið fyri tað turra spott, við tað at álvarsmál verða framløgd og viðgjørd uppá kvamsvís. Hóast hetta fer Javnaðarflokkurin kortini at viðgera hetta mál við tí álvara, sum málið hevur uppiborið, og tí vil umboð Javnaðarfloksins vísa á aðra gongda leið — eina leið har dentur verður lagdur á trygdina, á fíggjarligu fyrimunirnar hjá tí almenna og á at finna ta mest praktisku og best hóskandi loysnina fyri allar partar.

Undir umrøðuni av málinum vísti framsøgumaður Javnaðarfloksins á tann vanda, sum stendst av, at allir EDV-upplýsingar verða miðsavnaðir á einum stovni. Og hetta er galdand, uttan mun til um stovnurin er privatur ella almennur. Umboð Javnaðarfloksins kann lýsa henda vanda við einum dømi. Lat okkum siga, at tveir stovnar koyra á somu EDV-tólum og lutvíst hava EDV skipan felags, so kann ein á øðrum stovninum, ið hevur atgongd til EDV terminalarnar á hesum stovni, bert við at kenna kodu á hinum stovninum fáa allar tær upplýsingar til vega, ið annars skuldu verið duldar. Umboð Javnaðarfloksins heldur seg hava varhugan av, at longu nú ber til at misbrúka upplýsingar frá landsfólkayvirlitinum.

Sum áður nevnt kann umboð Javnaðarfloksins taka undir við høvuðsreglu 1, 3, 4, 5 og 7 og somuleiðis við høvuðsreglu 6, soleiðis sum hendan er broytt í álitinum. Men við tað at høvuðsregla 2 er av so avgjørdum og stórum týdningi, má umboð Javnaðarfloksins koma til ta niðurstøðu at mæla løgtinginum frá at samtykkja nú. Umboð Javnaðarfloksins vil minna á, at flokkurin undir umrøðuni av hesum máli vísti til álitið frá informatiónsbólkinum, har niðurstøðan var, at tað almenna stigvíst byggir upp sína egnu EDV-skipan, har hvørt øki innan tað almenna hevur egnar datacentralar, sum hvør sær einans hýsir teim upplýsingum, ið tørvur er á fyri at loysa eina ávísa almenna uppgávu, eitt nú innkrevjing av skatti.

Sum nevnt hevur skattanevndin bert havt ein fund um hetta týdningarmikla mál. Hesin vardi í fimm korter og gav als ikki høvi til at kanna tey sjónarmið um annan innkrevjingarhátt og aðra EDV-skipan, sum Javnaðarflokkurin vísti á undir 1. viðgerð. Hesi sjónarmið eru í stuttum nevnd í hesum minnilutaáliti. Út frá hesum setur umboð Javnaðarfloksins fram soljóðandi

## Uppskot til samtyktar

»Løgtingið samtykkir, at málið verður sent skattanevndini til víðari viðgerð, har m.a. verða kannaðar slíkar loysnir sum tær, ið Javnaðarflokkurin hevur víst á, og sum eru grundaðar á tey tilmæli, sum finnast í frágreiðing frá Informatiónsbólkinum, sum varð latin landsstýrinum í februar 1979.«

Minnilutin (Finnbogi Isaksen) ger hesar viðmerkingar: »Tjóðveldisflokkurin var fyrsti løgtingsflokkur, sum legði uppskot fram á ting um at seta kelduskattaskipan í gildi í Føroyum. Hetta hendi fyri meira enn 20 árum síðani. Flokkurin er framvegis fyri kelduskatti ella samtíðarskatti, sum tað eisini verður nevnt.

Landsstýrið hevur nú lagt eitt uppskot til samtyktar í 7 punktum fyri tingið, har biðið verður um eina prinsippavgerð um, hvussu samtíðarskatturin skal skipast. Minnilutin heldur, at mong ivamál eru í teimum ætlanum, sum landsstýrið hevur.

Sambært uppskotinum til samtyktar skal tann núverandi skattaskipanin avloysast av trimum skipanum:

1) Vanlig lønarinntøka verður skattað á tann hátt, at ein partur av lønini verður hildin aftur beinanvegin.

2) Fólk í sjálvstøðugari vinnu verða skattað við forskotsskatti.

Hesi fólk skulu lata sjálvuppgávu inn yvir inntøkuna árið fyri, og henda inntøka verður nýtt sum grundarlag fyri útrokningini av forskotsskattinum, uttan so at skattgjaldarin ynskir broytingar og kann føra fram grundir fyri ynskinum.

3) Feløg verða skattað sum higartil, t.v.s. at skatturin hjá feløgum verður framvegis grundaður á inntøkuna árið fyri og verður kravdur inn sum higartil.

Sum tað sæst, er hetta ein rættuliga fløkt skipan. Vanligir lønmóttakarar sleppa tó undan at lata sjálvuppgávu inn. Skatturin av inntøku teirra verður roknaður út, hvørja ferð viðkomandi fær løn. Hetta kann hava við sær, at hann — um hann hevur ójavna inntøku — verður skattaður við ójavnum prosenti frá viku til viku ella mánaði til mánað. Uppá ársbasis skuldi kortini tann »rætta« prosenthæddin verið kravd inn.

Sum heild má henda skipan, um hon fæst at virka nóg væl, metast sum ein fyrimunur fyri lønmóttakaran. Kortini er tað ætlanin, at skatturin skal eftirkannast, tá árið er úti, og hetta kann hava við sær, at skattgjaldarin fær sama stríð við eftirkanningini, sum hann nú

hevur av sjálvuppgávuni. Tað hevði verið ynskiligt, at ein skipan varð gjørd, har ongin eftirkanning var neyðug.

Sambært uppskotinum skulu allar lønarinntøkur flytast um ein føroyskan peningastovn, og postverkið, gjaldstovan og tær størru løngjaldsstovurnar »kunnu koma upp í skipanina«. Tað hevði verið bæði rætt og rímuligt at borið so í bandi, at hesir seinast nevndu stovnarnir komu við beinanvegin.

Allar til skattingina neyðugar upplýsingar skulu varðveitast á einari privatari data-fyritøku, sum eisini skal rokna skattin hjá løntakarum út fyri hvørja útgjalding. Hetta heldur minnilutin vera skeivt. Alt ov nógvar upplýsingar um einstaklingin verða savnaðar á einum stað, og betta kann sum frálíður opna møguleikar fyri misbrúki. Minnilutin heldur, at tað hevði verið rættari, at tað almenna sjálvt stóð fyri skattaútrokningini við egnari datastøð, sum í hesum føri bert átti at umfata skatt.

Eisini skipanin við álíkning úti í kommununum skal umskipast. Minnilutin kvíður fyri, at tær ætlaðu broytingarnar fara at økja ov nógv um skrivstovuveldið, og at tað verður ein dýr skipan.

Samanumtikið heldur minnilutin, at tær fáu upplýsingar, sum tingið hevur fingið frá landsstýrinum, eru ikki nóg gott grundarlag fyri støðutakan. Minnilutin fer at bíða við at taka støðu, til landsstýrið leggur lógaruppskot um samtíðarskatt fyri tingið.

Út frá hesum setir minnilutin einki uppskot fram.

20. januar 1983 varð loyvi til frávik til 2. viðgerð givið, sum síðan fór fram.

Uppskot til samtyktar frá minniluta í skattanevndini (Vilhelm Johannesen) fall við 9-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins pkt. 1 samtykt við 25-0, pkt. 2 17-5, pkt. 3 19-0, pkt. 4 17-0, pkt. 5 17-0, pkt. 6: broyting frá nevndini samtykt við 19-0, pkt. 7 við broyting samtykt við 19-0.

F.L.j.nr. 430-12-45-4

# 43. Fyribilsskipanin millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983

Ár 1982, mánadagin 13. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

**Løgtingið góðkennir, at Sovjetsamveldið fær loyvi við 14 skipum fram til 1. februar 1983 at veiða á konto 20.000 tons av svartkjafti upp á sáttmálan fyri 1983.**

**Viðmerkingar**

Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvd verða pørtunum at fiska í sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1983 vóru í Tórshavn 6.-9. december 1982, og samdust partarnir um skipan av fiskiskapinum fyri 1983.

Sambært sáttmálan við Sovjetsamveldið skuldu føroyingar seinri fáa boð um, hvussu ið 5.000 tons av kvotuni uppá 11.000 av toski í Barentshavinum skuldu býtast upp á øki, harímillum hvussu nógv ið fiskast kundi á norskum øki. Seinast nevnda nøgd kann fyrst áseta, tá ið tingingarnar við Noreg eru lidnar. Hesar samráðingar fara fram í Keypmannahavn í døgunum 20.-22. december í ár.

Landsstýrið hevur tí ikki ynskt at leggja sjálvan veiðusáttmálan fyri løgtingið, fyrr enn hesar samráðingar hava verið.

Umboðini fyri Føroyar og Sovjetsamveldið vórðu samd um, at best var fyri báðar partar, at sínámillum fiskiskapurin kundi halda fram ótarnaður, inntil endalig støða varð tikin til samráðingarúrslitið.

1. viðgerð 15 december 1982. Málið var viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 40: Loyvi til DDR at fiska svartkjaft á føroyskum øki og nr. 41: Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum. Málini vórðu beind í marknaðarnevndina, sum 17. december legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 13. december 1982 og undir 1. viðgerð 15. december beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Guttorm Klein, Jógvan Sundstein, Svend Åge Ellefsen, Jørgen Thomsen og Agnar Nielsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur hesa viðmerking:

Heitt verður á landsstýrið um at hava vakið eyga við, at svartkjafturin økist í virði, og at lutfallið tí má batna samanborið við annan fisk.

Annars eigur landsstýrið at hava eitt vakið eyga við støddunum av teimum kvotum av svartkjafti, ið verða latnar øðrum.

Minnilutin (Petur Reinert og Hans Marius Joensen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Tjóðveldisflokkurin hevur ferð eftir ferð víst á, at sáttmálin við USSR, sum verður endurskoðaður ár um ár, verður fyri hvørt ár til alt størri fyrimuns fyri USSR, ella við øðrum orðum, fyri hvørt ár er býtið skeivari, enn tað var árið fyri.

Tað, sum er hent, er, at svartkjafturin fyri okkum fær alt størri virði, eftir at alt størri partar av fiskiskapi okkara av svartkjafti er til matna, og í sama mun veksur virðið.

Annað er, at tíðin langt síðan er komin at fáa sett eitt hámark á svartkjaftavciðuna yvirhøvur.

Okkara uppskot er tí, at landsstýrið skjótast gjørligt viðger sáttmálan av nýggjum við USSR.

2. viðgerð 17. dec. 1982. Uppskot landsstýrisins samtykt við 26-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-2

# 44. Fíggjarløgtingslóg

Ár 1982, mikudagin 15. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

*Sí skjølini 6 A-B*

**Viðmerkingar til fíggjarløgtingslógina 2983/84**

Uppskotið til fíggjarløgtingslóg 1983/84 er vorðið til á sama hátt sum undanfarin fíggjarlógaruppskot.

Teir stovnar, sum fyrisita landsins pening, hava fingið boð um at gera teirra metingar av tørvinum á játtanum fyri komandi fíggjarár.

Eins og seinast hevur landsstýrið álagt stovnunum at gera metingar út frá teim lønarábótum, ið avtalaðar eru at galda í komandi fíggjarári. Hertil er tó at siga, at ávísir lønarsáttmálar møguliga verða uppsagdir at fara úr gildi í nevnda tíðarskeiði.

Herumframt skuldi roknast við teimum aldursviðbótum, ið falla til gjaldingar í sama tíðarskeiði, og loksins skuldi leggjast upp fyri 5 prístalsviðbótum. Fyri aðrar útreiðslur enn lønir er metingin gjørd út frá prísum galdandi 1. juli 1982 + 12 1/2%.

Innkomnu uppskotini frá stovnunum hava síðan verið viðgjørd í landsstýrinum. Undir viðgerðini hevur verið lagdur dentur á:

1. at avmarka útreiðsluvøksturin hjá almennu stovnunum,
2. at halda aftur við almennum fløgum, tó soleiðis at hetta í minst møguligan mun førir vinnuloysi við sær,
3. at meta um útreiðslurnar so neyvt sum gjørligt til tess at sleppa undan ov stórum játtanum á eykafíggjarløgtingslóg og
4. at fíggja sum mest av almenna virkseminum úr landskassanum heldur enn við lántøku.

Fíggjarløgtingslógaruppskotið 1983/84 javnvigar við 1.113.650.000 kr. í mun til núgaldandi fíggjarløgtingslóg, sum javnvigar við 949.650.000 kr. Her er sostatt talan um ein vøkstur upp á 17,5%. Lántøkan er sett til 52 mió. kr., sum er 4,7% av fíggjarløgtingslógini.

Í núgaldandi fíggjarløgtingslóg er lántøkan eisini 52 mió.kr., sum er 5,5% av fíggjarløgtingslógini.

Inntøkur landskassans av vanligum skatti eru mettar til 550 mió. kr., sum er 10% størri enn álíknaði landsskatturin í 1982. Inntøkurnar av tollgjøldum eru mettar út frá teim 1. december 1982 fyriliggjandi tølum, hækkað við 5%.

Sum nakað nýtt er hesa ferð roynt at gera eina 3-ára fíggjarætlan. Umframt at gera eina meting av inntøkum og útreiðslum komandi fíggjarár, er gjørd ein meting av hesum upphæddum ávikavist fyri 84/85 og 85/86 í 83/84-krónum. Av hesum tølum fæst ein hóming av landsstýrisins ætlan, tá um fíggjarviðurskifti ræður trý ár fram.

Fíggjarløgtingslógin 83/84 verður nú løgd fyri tingið, so sum stýrisskipanarlógin fyrisetir. Undir viðgerðini í fíggjarnevndini verður høvi at koma á tal við landsstýrið, sum vil vera til reiðar at koma við ájourførdum tølum og metingum um búskaparligu gongdina og hvørja ávirkan, hesi kunnu væntast og eiga at hava á fíggjarløgtingslógina.

1. viðgerð 27. januar 1983. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi

*Sí skjal 6c*
*Viðmerkingar til álitið*

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1982 og undir 1. viðgerð tann 27. januar 1983 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarlógaruppskotið javnvigar við kr. 1.113.615.000,- í útreiðslum og inntøkum.

Í mun til núgaldandi fíggjarløgtingslóg, sum javnvigar við kr. 949.650.000,-, er talan um ein vøkstur eftir fyriliggjandi uppskoti frá landsstýrinum uppá 17,5%.

Inntøkur landskassans av vanligum skatti eftir uppskotinum eru mettar til 550 mió. kr., sum er 10% meira enn álíknaði landsskatturin í 1982.

Tollgjøldini eru sett til 507 mió. kr., og eru tær mettar út frá teimum pr. 1. december 1982 fyriliggjandi tølum, hækkað við 5%.

Landsstýrið hevur hesa ferð sum nakað nýtt roynt at gera eina 3 ára fíggjarætlan. Umframt at gera eina meting av inntøkum og útreiðsl-

um komandi fíggjarár er gjørd ein meting av hesum upphæddum ávikavist fyri 1984/85 og 1985/86 í 1983/84-krónum.

Fíggjarnevndin hevur sum vanligt havt fundir við peningastovnarnar, Búskaparráðið og við Føroya Fiskasølu.

Eisini hava umboð fyri Føroya Lívkningarráð, Skattadeildina og tolldeildina á Føroya Gjaldstovu verið á fundi.

Fyri fíggjarnevndina er tað av áhuga at fáa at vita frá teimum, ið eru serkønir í fíggjartættunum í vinnulívi okkara, hvussu teir gera upp, hvussu árið 1982 hepnaðist, og hvussu teir meta útlitið fyri 1983.

Viðvíkjandi høvuðsvinnu okkara, fiskaútflutninginum, fekk fíggjarnevndin upplýst, at mett verður, at ein vøkstur verður í komandi ári uppá umleið 6-7%, ella at útflutningurin kann væntast at vaksa við 66-76 mió. kr. Eftir upplýsingum frá Hagdeildini vóru í 1982 útfluttar matfiskavørur fyri kr. 1.113.000.000,- og ídnaðarfiskavørur fyri 110.000.000 kr. Tað varð upplýst, at tað verður meira og meira torført fyri hvørt árið at selja okkara fiskaframleiðslu uttanlands. Samanumtikið er ein vøkstur uppá 6-7% einki gott útlit, og serliga eru trupulleikar við sølu av saltfiski. Orsøkin til trupulleikarnar við saltfiskinum er støðan í Nigeria og tær avleiðingar, hetta hevur fingið her og aðrastaðni. Útlitið fyri svartkjaftaútflutninginum (fars) var umrøtt.

Eftir fyriliggjandi hagtølum og eftir metingum frá Hagdeildini er orsøk til at rokna við, at vøksturin í fiskaútflutninginum í 1983 verður fallandi í mun til árini 1981 og 1982. Veiðutølini í 1982 hava verið nakað størri enn árini frammanundan. Fiskaprísirnir eru í árinum farnir upp við umleið 9%.

Búskaparráðið peikaði á gjaldsjavnaspurningin sum ein aðaltátt í búskapi okkara nú. Fyri árið 1982 er hallið gjørt upp til 156 mió. kr. Síðani 1974, undantikið 1977, hevur hall verið á gjaldsjavnanum, og er hesin peningur fíggjaður við almennari og privatari lántøku, mest uttanlands. Búskaparráðið hevur víst á trupulleikan og ger vart við, at einki framtak er hent í hesum spurningi, heldur tvørtur ímóti. Handilsjavnahallið fyri 1983 væntast at koma upp á 753.000.000 kr. Tey stóru tølini koma frá íløgum í skip í 1983, innflutt skip og skip bygd í Føroyum. Bert íløguvirðið fyri tey innfluttu skipini er 427 mió. kr. Kravið um fígging uttanlands til hesar íløgur er 360 mió. kr.

Nettoskuldin til útlandið við árslok 1982 er 1.605.000.000 kr. Talið kemur fram solciðis, at nettoskuldin til útlandið primo 1982 var 1.358.000.000 kr., gjaldsjavnahallið 156.000.000 kr. og mett kurstap 91.000.000 kr. ella alt kr. 1.605.000.000,-. Uttanlandsskuldin ultimo 1983 verður mett at vera umleið 2.100.000.000 kr., og rentubyrðan fer at toga upp ímóti 135.000.000 kr. Búskaparráðið peikar á tann mangl-

andi javnvág í fíggjarligu viðurskiftum okkara og umrøddi, hvat gerast kann fyri at hjálpa uppá hetta, og eisini hvat fylgjurnar verða, um einki verður gjørt fyri at gera nakað við tey vánaligu viðurskiftini. Nomið varð við lønarlagið her á sjógvi og á landi, hvussu hetta er, og eisini í mun til tær resoursir, ið land okkara eigur, og eisini í mun til, hvat lønarlagið er í teimum londum, sum vit kappast við á útflutningsøkinum. Sum ein lítlan glotta varð víst á, at býtislutfallið í 1982 ikki er vorðið verri, og eisini hevur uppsparingin verið stór í 1982. Ávísir íløguspurningar innan fiskivinnuna vórðu eisini umrøddir. Peningastovnarnir umrøddu gongdina í 1982 og søgdu frá, at eftirspurningurin eftir peningi hevur verið stórur, samstundis sum uppsparingin hevur verið hampilig. Likviditeturin hjá peningastovnunum er nú eitt sindur betri enn ultimo 1982, tá støðan var heldur vánalig. Peningastovnarnir gjørdu vart við, at eftir áskoðan teirra verður truplari nú at fáa uttanlandslán, lánini verða stytri, rentutreytirnar einki betri og treytirnar annars kanska truplar at lúka.

Peningastovnarnir vóru eisini samdir um, at gjaldsjavnahallið er alt ov stórt, og at nakað má gerast at tálma innflutninginum og privatnýtsluni. Føroyska rentuskattaskipanin varð umrødd, og mæltu peningastovnarnir frá, at nortið verður við hetta, tá tað kann fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri fiskivinnuna.

Í løtuni er oljuprísurin fallandi, og óvist er, hvussu hesin spurningurin verður loystur. Dollarkursurin, sum hevur verið fallandi eina tíð í 1982, hevur verið ójavnur og flutt seg upp og niður. Tað er serliga kursbroytingarnar í dollar og DM, sum eru av týdningi fyri føroyska útflutningin. Bretska pundið er ikki stabilt, men er tað heldur ikki tann størsta nøgdin, ið verður seld har.

Í 1982 høvdu peningastovnarnir, Búskaparráðið og aðrir, ið fíggjarnevndin hevði fund við, ta niðurstøðu, at orsøk var til at síggja eitt sindur ljósari uppá viðurskiftini samanborið við 1981. Í ár vísti Búskaparráðið á, at býtislutfallið ikki er versnað, men annars vóru eingi úttalilsi, ið góvu ábending um ljósari tíðir, heldur tvørtur ímóti: Gjaldsjavnahallið er sera hættisligt. Umrøtt varð, hvussu viðkvæmt tað er við eini útbygging av einum farmaskipaflota og svartkjaftaskipum og virkjum, har fløgan fyri hvørt arbeiðsplássið sær er munandi størri, enn áður hevur verið talan um. Tølini eru vorðin so stór, at bert má farast fram við størsta varsemi.

Samanumtikið er tann týðandi munur í tølunum, ið eru á borðinum til hesa viðgerð, at javnvágin í fíggjarlógaruppskotinum er vaksin tað, ið ein kundi vænta við teirri samfelagsgongd, ið nú er her á landi. Men tað, sum teknar seg á vegginum, er tey óvanliga høgu tøl viðvíkjandi

væntaðum gjaldsjavnahalli uppá 465 mió. kr. og væntað handilsjavnahall uppá 753 mió. kr. fyri árið 1983. Væl er tað greitt, hví hesi tøl eru vorðin so stór, sum tey nú eru, men kravið til innløguorkuna og til gjaldsorkuna verður nú munandi økt. Gjaldstreytir skulu haldast, og møgulig frávik kunnu fara at verða dýr. Tað eru skipakeypini og skipainnflutningurin, sum hava kravt hesar pengar, og mugu hesar íløgur fíggjast uttanlands. Umframt hesa fígging er eisini neyðugt við fígging innanlands til stuðulslán og til afturrindan av rentum. Tá má eisini gerast vart við, at grunnurin til endurnýgging av fiski- og farmaskipaflotanum er negativur við umleið 70 mió. kr. Tað er at vóna og at vænta, at ætlaðu íløgurnar fara at bera seg, og er ein fortreyt tann, at ongar størri broytingar verða viðvíkjandi donsku krónuni, prísviðurskiftunum, nøgd av útflutningi, virksemi á landi, nýtsluni o.t. Heimsbúskapurin er í løtuni í stórum umskifti, og vænta kønir menn, at rentan fer at falla. Gongdin í búskapinum í USA tykist at vera altavgerandi fyri, hvussu aðrir taka partar fyri seg. Í Europa er óvissan rættiliga stór. Nakað bendir á, at tað verða ljósari tíðir í heimsbúskapinum. Tá er framvegis spurningurin um oljuprísin óvissur.

Fíggjarnevndin hevur sostatt sum vant havt fundir við landsstovnar, peningastovnar og vinnuna. Eisini er útvegað ávíst tilfar til viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum.

Fíggjarnevndin leggur mestan dentin á, hvat Det Rådgivende Udvalg vedrørende Færøerne sigur um viðurskiftini. Henda nevnd hevur gjørt álit sítt fyri 1982 liðugt tann 4. mars 1983 og sent tilfarið til fíggjarnevndina, sum tann 21. mars 1983 hevur fingið tilfarið handað.

Í einum »resume« ger Det Rådgivende Udvalg vedrørende Færøerne meira generellar viðmerkingar til fíggjarligu gongdina í 1982. Peikað verður á, at nýtslan er vaksin, umleið 4% í innflutninginum av vørum. Innanlandseftirspurningurin hevur verið so munandi, at hallið á gjaldsjavnanum frá 1981-82 er økt við umleið 85 mió. kr. Hetta hóast kursgongdin fyri dollar og pund hevur verið betri viðvíkjandi útflutningi okkara.

Umrødda nevnd heldur ikki, at væntast kann, at tað uttanifrá verða viðurskifti, ið betra um føroyska búskapin í 1983. Væntandi falla prísirnir á olju, men metir nevndin, tað er ivasamt, um fiskaprísirnir fara at hækka, og víst verður á trupulleikarnar viðvíkjandi sølu av saltfiski.

Um prístalsgongdina verður sagt: »Det nylig foreslåede indgreb, hvor nulstillingen af pristallet indebærer en reduktion af dyrtidsreguleringens dækningsgrad, vil antagelig medføre en vis dæmpning af indkomstudviklingen.«

Viðvíkjandi føroyska búskapinum sum beild verður sagt soleiðis:

»Der skal imidlertid meget kraftige indgreb til for at genskabe ligevægt i den færøske økonomi, og alt tyder på, at de hidtil trufne ikke er tilstrækkelige til at nå dette mål.«

Í hesum sambandi kann verða víst á uppskot landsstýrisins um, at kravið til útgjald, tá selt verður eftir sáttmála, er sett til 45%.

Um inntøkusíðuna eru útvegaðar upplýsingar, og verður mett, at skattur (§1) og toll- og framleiðslugjald (§2) fara at geva tað, sum landsstýrið hevur mett.

Vísandi til frammanstandandi viðmerkingar setir meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) fram hesi

**Broytingaruppskot**

**§6. Landsstovnar:**

6033 Bygdaleiðir
lækkað 519.000 kr.
sett til ..... ÷ kr. 4.700.000,-
Um størri virksemi verður enn áður, skal málið leggjast fyri Fíggjarnevnd løgtingsins.

6567 Hvalastøðin við Áir
økt kr. 20.000
sett til..... ÷ kr. 50.000,-

**Greinin er sett til + kr. 73.043.000**

**§11. Landsfyrisitingin**

11053 Landsskrivstova
økt kr. 369.000
Tekstviðgerðartól
Sett til kr. 6.169.000,-

11155 Uttanríkistænasta
økt kr. 10.000
Leigumál
Sett til ..... kr. 418.000,-

11359 Almannastovan
Lækkað kt. 103143 176.000
konto 103143 rættað
lækkað kt. 103168 124.000
strikað sosialráðgevara
hækkað kt. 213806 30.000
Talið í skjølunum
kr. 152.300 skal vera
kr. 182.000
Almannastovan sett til..... kr. 4.650.000,-

11452 Føroya Gjaldstova
lækkað kr. 346.000
Eykahjálp til skatta-
innkrevjing lækkað
Gjaldstovan sett til..... kr. 15.039.000,-

11568 Trygdareftirlit
Játtað ..... kr. 400.000,-

11706 Búskaparráðið
lækkað kr. 8.000
Telefon og telex (vekslari)
Búskaparráðið sett til ..... kr. 1.987.000,-

11851 Ognin Tinganes
Økt kr. 100.000
Sjó- og vektabúirnar
- projektering
Ognin Tinganes sett til ..... kr. 1.713.000,-
Greinin er sett til **kr. 71.145.000**

**§12. Heilsumál**

12109 Landssjúkrahúsið
tækkað kr. 600.000
isotoparbeiði spart
økt
2 laborantar
1 skrivari kr. 360.000
Landssjúkrahúsið er sett til kr. 57.151.000,-

12202 Klaksvíkar sjúkrahús
Lækkað kr. 200.000
isotoparbeiði spart
økt kr. 353.000
Játtað tól sí bls. 63 í skjølum
p-r-s-v-x
+ partur av Y (gastoskop 102.000)
Klaksvíkar sjúkrahús sett til ..... kr. 14.363.000,-

12304 Suðuroyar Sjúkrahús
lækkað kr. 100.000
isotoparbeiði spart
økt við kr. 125.000
Koloskop (75.000)
Latriskop (50.000)
Henda játtan er treytað av, at
stýrið fyri Suðuroyar sjúkrahúsi
góðkennir hesar íløgur.
Suðuroyar sjúkrahús sett til ..... kr. 6.926.000,-

**Greinin er sett til kr. 84.953.000**

**§13. Samferðslumál**

1. Nýggir vegir og brýr
økt við kr. 500.000
Lækkað við kr. 500.000
**Glyvragjógv ineftir** (s. 78)
frá 1,5 til 1,0 mió. kr.
Lækkað við kr. 500.000
**Felags** frá 5,0 til 4,5 mió. kr.
(sí bls. 98 í skjølum 5.5-5.0)
Strendur: Játtað 1,5 mió. kr.
13.1 sett til..... kr. 59.500.000,-

3. Lendingar í grunn
Økt kr. 1.000.000
13.3 sett til ..... kr. 23.000.000,-

8. Byggi- og rakstrargrunnur
Lækkað kr. 1.000.000
13.8 sett til ..... kr. 3.000.000,-

10. Eykastudningur til 6 ára
havnaætlan 1978-84 ..... kr. 8.000.000,-

**§13. er sett kr. 171.300.000**

**§14. Skúlamál**

14053 Felagsútreiðslur
Lækkað við kr. 267.000
síða 102 í skjølum. Sýtt.
14053 sett til ..... kr. 338.000,-

14174 Studentaskúli o.a.
Lækkað við 72.000 kr.
Leiguinntøkur, Klaksvík
14174 sett til ..... kr. 10.452.000,-

14205 Studentaskúli í Hoydølum
Lækkað við kr. 85.000,-
Umvælingar kt. 213607
14205 sett til ..... kr. 15.951.000,-

14953/313335: Studentaskúli í Hoydølum
í grunn
Lækkað við kr. 500.000 (sýtt)
14953/313439: Landsskúlafyrisitingini
at ráða yvir. Eftirútbúgving
av handverkarum.
Nýggj konto ..... kr. 200.000,-

**§15 Vísindi, bókmentir og list**

15304 Landsskjalasavn
103168 økt við kr. 29.000
sett til..... kr. 239.000,-
233051 lækkað við kr. 45.000
sett til ..... kr. 45.000,-
253505 lækkað við kr. 40.000
sett til ..... kr. 10.000,-

| | | | |
|---|---|---|---|
| Flyting: Lækkað við kr. 10.000 | | | |
| sett til ..... | | kr. | 5.000,- |
| Pakkitilfar: Lækkað við kr. 10.000 | | | |
| sett til ..... | | kr. | 5.000,- |
| Skráseting: Lækkað við kr. 18.000 | | | |
| sett til ..... | | kr. | 10.000,- |

**15304 er sett til kr. 988.000**

15406 Føroya Fornminnissavn
konto 103143
lækkað við kr. 43.000 (s. 159)
Savnshjálparanæmingur
lækkað við kr. 54.000

**15406 sett til kr. 3.088.000**

15508 Bygdasøvn
lækkað við kr. 150.000
Sýtt játtan til keyp av húsi

**15508 sett til kr. 198.000**

15551 Fiskirannsóknarstovan
Datatól økt kr. 625.000
M. Heinason
lækkað kr. 1.125.000 kr. samlað

**15551 sett til kr. 8.547.000**

15717 DGU
Hækkað við kr. 57.000
til húsarakstur
Sí viðmerkingar til §15

**15717 sett til kr. 472.000**

323116
Økt við kr. 100.000
Skúlabókaútgáva

323124
lækkað við kr. 3.237
Norðurlandahús

323244
lækkað við kr. 150.000
Savn í Hoyvík
**Greinin er sett til kr. 37.636.000**

**§16. Fiskivinna, sigling o.t.**
333033 Grindir
Lækkað við kr. 40.000
Sett til kr. 10.000

333082 Vaktarskip
Økt við kr. 200.000
Sett til kr. 300.000

**Greinin er sett til kr. 253.178.000**

**§17. Landbúnaður og matrikulering**
17103 Matrikulstova
253306 lækkað kr. 100.000
sett til kr. 550.000

17901/343021: Nýdyrking v.m.
Lækkað kr. 200.000
sett til kr. 1.800.000

17901/343079: Træplanting
Lækkað við kr. 90.000
Sett til kr. 700.000

**Greinin er sett til kr. 28.314.000**

**§18. Handil, ídnaður v.m.**

18907/353042 Til Menningargrunn
Økt kr. 1.000.000
Sett til kr. 9.000.000

18907/353083 Til Orkugrunn
Lækkað kr. 4.500.000
Sett til kr. 4.500.000

**Greinin er sett til kr. 26.146.000**

**§19. Almannamál v.m.**

19403 Vanlig forsorg
Lækkað kr. 1.000.000
Sett til kr. 6.810.000

19904/363636 Fráhaldsfeløg
Økt við kr. 50.000
Sett til kr. 350.000

19904/363669 Meginfelag Teirra Brekaðu
Økt við kr. 70.000
Sett til kr. 150.000

19904/363715 Føroyahús í Keypmannahavn
Økt við kr. 107.000
Sett til kr. 232.000

**Greinin er sett til kr. 190.980.000**

Minnilutin (Atli P. Dam) førir fram:

Fyriliggjandi triðja fíggjarlógaruppskotið frá sitandi samgongu sýnir eins og hini bæði undanfarnu, at samgongan á ongan hátt hevur verið før fyri at umboða ein positivan »alternativan« politikk, men heldur ein politikk, sum ber á tað borðið, at risatølini á fíggjarlógini meira og meira umboða eitt alment virksemi við øktum forbrúki, ið lutfalsliga vegar tyngri og tyngri í mun til fløgu- og arbeiðsskapandi peninganýtsluna á fíggjarlógini.

Reypið um sparing, nýskapan og at fáa »hallandi skútuna aftur á rættkjøl« er eisini tagnað, so hvørt vónloysið og tørvurin á framburðsskapandi og mennandi búskaparvirksemi hevur sýnt seg í skjóta vøkstrinum í føroyskari uttanlandsskuld.

Hóast hitt almenna seinastu tvey árini hevur tikið — og framhaldandi tekur — lutfalsliga størri part av bruttotjóðarúrtøkuni innlendis í landskassan fyri at fíggja vaksandi almenna forbrúkið, so hevur gjaldjavnahallið verið alsamt vaksandi.

Minnilutin vísti í fjør á, at forbrúkið á sentrala økinum veksur skjótt, meðan útbyggingin úti um í landinum er minkandi. Tá so allar loysnir av samfelagsmálum verða drignar út í órímiliga langa tíð, er ikki løgið, at vit fáa eina tómgongd í búskaparligu ringrásini, sum mest er ein forbrúksgongd.

Meginorsøkin til hetta er helst klandrið innan samgonguna, sum inntil »pakkaupplatanina« scint í vetur forðaði fyri loysnum á nærum øllum økjum.

Tá tvey ár verða skrødd burtur úr politiska almanakkanum, soleiðis at eingin nýhugsan fer fram, so er neyðugt at velta dupult so nógv upp úr nýggjum tey komandi árini.

Tíverri er lítið útlit til, at slík nýdyrkan verður, sjálvt um samgongumenn júst í løtuni látast, sum gongulagið er betri.

Nýggj tingseta byrjar á ólavsøku, og er tá væntandi, at tann politikkur, sum byggir so nógv á persónlig og einstaklingaáhugamál — so sum v&k-politikkurin hevur avdúkað — aftur dettur sundur av innanhýsistoganini.

Henda togan saman við § 13 í samgongusáttmálanum niðurbindur samstundis allar aðrar loysnir, meiriluti kundi fingist fyri á løgtingi.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini hava ymsir stovnar lýst hugsan sína um búskaparliga útlitið framyvir. Mynd teirra er rættiliga døpur, og sýnir hon, at samgongan eingi verulig tiltøk hevur at seta í verk fyri at venda búskaparligu gongdini.

Sokallaða ráðgevandi nevndin, ella »Statsministeriets rådgivende udvalg«, verður mangan mett sum eitt »orakul« í metingum sínum.

Hon vísir í áliti sínum á, at landsstýrið er komið stutt ávegis til tess at fáa javnvág í føroyskan búskap, og at hon vísir á, at vit í 1982 hava havt eitt hall á handilsjavnanum upp á 425 mió. kr. og eitt gjaldsjavnahall upp á 156 mió. kr., soleiðis at samlaða uttanlandsskuldin nú er komin upp á 1605 mió. kr., hóast tilskotið frá statinum er vaksið við 80 mió. kr., og okkara partur av yvirskoti tjóðbankans var heilar 24 mió. kr.í fjør.

Nú ber til at vika metingarnar frá ráðgevandi nevndini, tí hon er einki »orakul«, men endurgevur bert upplýsingar, henni eru sendar frá landsstýrinum og Hagdeildini. Tað eru tí fleiri metingar og upplýsingar, sum minnilutin heldur eru skeivar, hesar telja bæði positiva og negativa vegin.

Tað hevur tí størri týdning sjálvstøðugt at gera sær eina niðurstøðu burtur úr tí tilfari, fingið er til vega.

Her er av serligum týdningi metingin, sum Hagdeildin hevur gjørt viðvíkjandi handilsjavnahalli, gjaldsjavnahalli og uttanlandsskuld í 1983. Hesi tøl eru fyri handilsjavnan ÷ 753 mió. kr., fyri gjaldsjavnan ÷ 465 mió. kr. og fyri uttanlandsskuld ÷ 2100 mió. kr.

Her eru tó fleiri almennar lántøkur hjá landskassa, kommunum, SEV, telefonverki og øðrum stovnum ikki íroknaðar, heldur ikki eru privatar lántøkur undantikin skip tiknar við, og lítið er lagt uppfyri fyri forbrúksøking, so helst verða hesi hall munandi størri, soleiðis at uttanlandsskuldin við ársfok 1983 verður nærri hálvaritriðju milliard. Hetta hevur Javnaðarflokkurin fyrr víst á. Eftir trimum árum er uttanlandsskuldin tá trífaldað, og verður samgongan sitandi valskeiðið út, kann roknast við, at hon verður ferfaldað.

Í mun til undanfarnu tvey árini verður í 1983 tann broyting, at umleið helmingurin av handilsjavnahallinum upp á 800 mió. kr. verður at stava frá skipaíløgum. Hetta er í sjálvum sær gagnligt — hóast hallið bert skuldi stavað frá íløgum --- og vónandi greiða hesi skip at afturrinda rentur og avdráttir yvir egnan rakstur, men sjálvt um so verður, so tekur tað ikki burtur tann veruleika, at ímeðan er sera stórur partur av almennu orkuni ár framyvir bundin at tilskotum og veðhaldum til eitt lítið tal av projektum við fáum arbeiðsplássum hvørt og við færri ánarum, enn vanligt hevur verið fyri íløgur fyrr.

Sentraliseringsgongdin ger soleiðis aftur her vart við seg, og politikkurin, sum miðar ímóti savnan av kapitali og orku á færri hendur, er meiri eyðsýndur, nú samgongan hevur sitið í tvey ár.

Keypiorka og realløn hjá vanligum løntakara er hart skerd hesi tvey ár — til at minka um forbrúkið, sigur samgongan — men hetta tykist hava verið til fánýtis, tí forbrúksmøguleikar annara samstundis eru

vaksnir so mikið, at samlaða forbrúkið alsamt veksur skjótt.

Afturat omanfyri nevnda umbýti í forbrúksorku kemur eitt annað fyribrigdi, sum kemur at tyngja gjaldsjavnan. Tað eru teir spekulatiónsvinningar, sum liggja í inulendis søluni av 15-20 ára gomlum skipum. Vinningar, sum skulu fíggjast við útlendskum lánum, gjaldast av fiskivinnuni, uttan at reell virðisøking liggur aftan fyri hvørt skipið. Hetta kemur at tyngja raksturin framyvir, samstundis sum henda »fortjenastan« veksur munandi um forbrúksmøguleikarnar.

Tað vildi verið hóskiligari, um samgongan í minni mun enn nú trekti vekslar upp á komandi ættarlið og prioriteraði brúkið av verandi orku meira ímóti útvegan av nóg stórum tali av arbeiðsplássum, so hesi ættarlið betur vórðu før fyri at afturrinda ta lántøku, tað kortini kann verða skilagott og neyðugt at fremja.

Vøksturin í uppkrevjing samgongunnar av tolli og skatti er munandi størri, enn fíggjarlógaruppskotið boðar frá.

Í verandi ári er meirinntøkan av tolli og skatti sammett við fíggjarlógina helst 60-80 mió. kr., og tá skattaprogressiónin og tollhækkingar sambært prísvøkstur sleppa at gera vart við seg í 1983/84 eisini, uttan at nakað sosialt endurgjald verður veitt, verða eisini á komandi fíggjarlóg munandi meirinntøkur.

Hóast hesar meirinntøkur og hóast vøksturin í fíggjarlógartølum merkir uppskot landsstýrisins fyri komandi ár eins lítið og í ár nakra »meirservisu« fyri borgarar, heldur hin vegin. Sum áður nevnt er uppskotið heldur ikki mennandi, hvat viðvíkir grundíløgum fyri vinnulívsútbyggingum.

Minnilutin vil tí seta fram nøkur broytingaruppskot, sum miða ímóti at fremja fleiri grundíløgur, veita betri almenna tænastu og geva eitt ávíst endurgjald til teirra við minstu gjaldorkuni.

Sostatt verður skotið upp at broyta:

| | | |
|---|---|---|
| § 1 | Skattur | (1.000 kr.) |
| 1108 | Vanligur landsskattur | 574.000 |
| 1502 | Sjómansskattur | 14.000 |
| 1702 | Rentuskattur | 11.500 |
| 1804 | Vegskattur | 14.500 |
| | Greinin sett til | 614.000 |

**Viðmerking:**

Inntøkuvøksturin mettur út frá 300 sjálvuppgávum í Tórshavn, uppgávu frá kommununum og løngjaldsstovum verður mettur til 12-13%. Hetta gevur eina skattahækking ikki minni enn 16.5-17%. Persónsskattur gav í 1982/83 452 mió.kr. og skattur av feløgum 37 mió.kr. Mett er tí í 1983/84: Perssónsskattur 527 mió.kr. og skattur av feløgum 47 mió.kr.

§2 Tollur og framleiðslugjøld

| | | |
|---|---|---|
| 2017 | Tollgjøld | 528.000 |
| 2708 | Framleiðslugjøld | 16.000 |
| | | 544.000 |

**Viðmerking:**

Tollgjøldini geva í 82/83 út við 480 mió.kr. og framleiðslugjøldini umleið 14 mió.kr., t.v.s. at sjálvt við minni vøkstri enn undanfarin ár verða hesi í minsta lagi ájavnt við omanfyri metta.

§3 Onnur gjøld

| | | |
|---|---|---|
| 3204 | Arvagjøld | 740 |
| | Greinin er sett til | 1.200 |

§6 Landsstovnar

| | | |
|---|---|---|
| 6014 | Strandfaraskip Landsins | ÷ 35.000 |
| 6033 | Bygdaleiðir | + 5.000 |
| 6204 | Telefonverkið | ÷ 15.000 |
| 6408 | Oljugoymslur | + 1.500 |
| | Greinin sett til | ÷ 59.658 |

**Viðmerking:**

Inntøkur strandferðslunnar av leigumáli Teistans eru sera ótryggar og, sum tað skilst, ætlaðar keypi og rakstri av helikoptara. Skal tí ein strandferðslutænasta kunna veitast, sum liggur á eitt sindur hægri støði enn hon í 1982/83, mugu játtast 35 mió. kr.

Bygdaleiðir økja virksemi sítt. Minnilutin ger vart við, at ætlað er, at landskassin skal »yvirtaka« statsins part av kostnaðinum av skúlabarnaflutningi. Hesi »yvirtøku« tekur minnilutin ikki undir við, men mælir landsstýrinum til at lætta kommununum uttan samstundis at yvirtaka statsins part.

Hækkingin í leigugjaldi fyri oljugoymslurnar er alt ov lág.

| | | |
|---|---|---|
| §7 | Partur av avlopi tjóðbankans | |
| | 7011 Partur av avlopi | 15.000 |

**Viðmerking:**
Hóast lictta avlop í fleiri ár hevur verið 20-25 mió. kr., er bert budgetterað við 2,5-5 mió. kr. hesi ár.

| | | |
|---|---|---|
| §10 | Løgtingið | |
| | 10208 Løgtingstíðindi og alment kunngerðablað | 1.000 |
| | Greinin sett til | 8.933 |

| | | |
|---|---|---|
| §11 | Landsfyrisiting | |
| | 11053 Landsskrivstova | 6.170 |
| | 11.1276 Dataeftirlit | 500 |
| | 11359 Almannastova | 5.040 |
| | 11604 Valuta- og prísráð | 1.010 |
| | Greinin sett til | 71.875 |

**Viðmerking:**
Tekstviðgerðartól játtað landsskrivstovuni. Dataeftirlit kann ikki fremjast fyri 175.000 kr. Sosialráðgevi skal setast fyri Norðstreym og Vágoy, men framvegis er bert 1/2 í Eysturoy og 1/2 í Norðoyum, mælt verður til at seta 1/2 afturat fyri hvørt økið. Eftirlit við prísum og vinningi meira neyðugt aftan á prístalsskerjingina.

§12 Heilsumál
Minnilutin tekur undir við teim broytingum, skotnar eru upp av meirlutanum.

| | | |
|---|---|---|
| §13 | Samferðslumál | |
| | 2 Havnagerð í grunn | 68.800 |
| | 3 Lendingar í grunn | 24.000 |
| | 6 Berghols- og brúgvagerð í grunn | 18.000 |
| | 9 Fær viðmerking: Framhald av berghols-gerð til Trøllanes | |
| | Greinin sett til | 188.800 |

**Viðmerking:**
Av verandi havnaætlan er bygt fyri 170 mió. kr., og í 1983/84 verður helst bygt fyri umleið 40 mió. kr.

Av hesum er statsins partur 52,5 mió. kr. Útvegarar eru 30 mió. kr.

Minnilutin mótmælir yvirtøkuni av teim 30-40 mió. kr., landsstýrið tykist í ferð við at fremja, og mælir til, at løgtingið áleggur landsstýrinum at halda fram við neyðugum samráðingum til tess at forða hesi yvirtøku. Fyri kortini at seta landskassan føran fyri ímeðan at leggja statsstudningin út til kommunurnar, er mælt til hækking av havnakontoini við 20 mió. kr.

Tá hesin peningur gongur inn aftur, verður hann at nýta til niðurgjaldan av uttanlandsskuld.

Lendingakontoin hækkað við 2 mió. kr., harav 1 verður avsett til bakkaverju í Sumba.

Berghols- og brúgvagerð hækkað við 4 mió. kr., so farast kann undir bergholssambandið til Sumbiar í komandi fíggjarári.

Tað má bera til at hava tvey »primer« bergholsarbeiði í gongd samstundis, tá hugsað verður um, at vegagerðin til bergholsmunnan ikki krevur boriútgerð í komandi fíggjarári.

§14 Skúlamál

| | | |
|---|---|---|
| 14653 | Miðstøð fyri undirvísingaramboð | 600 |
| 313128 | Studningur til ÍSF | 1.800 |
| Greinin sett til | | 97.864 |

**Viðmerking:**
Sambært upplýsing frá landsstýrismanninum í skúlamálum vil amboðsmiðstøð sum frá líður spara stórløgur í søvn í einstøku skúlunum, tá somu tól koma at verða nýtt av fleiri skúlum. Ynsktar eru 1,2 mió. kr., men tað ber til at grunda savnið við kr. 600.000,-, serliga tá havt verður í huga, at á donsku fíggjarlógini eru tøkar 2-3.000.000 kr. til sama endamál, tá savnið lýkur ásettar treytir.

ÍSF hevur søkt um fløgustuðul kr. 400.000,- eina ferð. Verður rakstrarstudningurin settur til kr. 1.400.000 kr., og fer »veddingin« at roynast, skuldi ÍSF verið betur ført fyri at røkt samfelagsgagnligu uppgávuna, tað hevur átikið sær.

§15 Vísindi, bókmentir og list.

Minnilutin kann taka undir við broytingunum í uppskoti meirlutans undantikið

| | | |
|---|---|---|
| 323157 | Útvarpssendistøð í grunn | 5.000 |
| | Greinin sostatt sett til | 40.136 |

**Viðmerking:**
Sambært upplýsing frá landsstýrismanninum í mentamálum ber ikki til at fara undir bygging av millumbylgjusendara við játtan upp á 2,5 mió. kr. Mælt verður tí til at nýta 4,5 mió. kr. til endamálið og, um hægri peninganýtsla krevst í fíggjarárinum, tá at lánfíggja hesa.

500.000 kr. vera at nýta til at koma ávegis við bygging av stuttbylgjusendara til tíðinda- og talusendingar.

§16 Fiskivinna, sigling o.t.

| | | |
|---|---|---|
| 16018 | Vrakarastovnur | 2.240 |
| 333017 | Minstaløn og annar stuðul | 206.000 |
| 333082 | Vaktarskip í grunn | 300 |
| 16403 | Laksa- og sílaaling | 3.000 |
| | | 258.738 |

**Viðmerking:**
Vrakieftirlitsmaður at seta í Sandoynni og tveir góðskumetarar, ið ferðast runt til øll virki fyri at tryggja sama góðskumetingarstig um alt landið.

Stuðulsskipanin verður umløgd soleiðis, at við 206 mió. kr. verður møguligt at veita tann av fiskivinnuráðnum tilmælta studning til húkveiddan fisk og til saltfisk.

2 mió. kr. at nýta til keyp av laksasmolti at seta út í t.d. Svøríki, Noregi, Íslandi ella aðra staðni.

Vaktarskip at umbyggja til sjómansskúlalæruna.

§17 Landbúnaður og matrikulering

| | | |
|---|---|---|
| 17205 | Royndarstøð | 1.670 |
| | Greinin sett til | 23.704 |

**Viðmerking:**
Projektið viðvíkjandi Royndarstøð fevnir ætlaðari bygging, ið røkkur 75-80 mió. kr. Hetta tykist stórtøkið og eigur at verða endurskoðað.

§18 Handil og ídnaður

18109 Arbeiðseftirlit fær viðmerking:

Landsstýrið fremur sundurbýting av kontoini ímillum arbeiðseftirlit og tekniska deild/metingarstovn.

| | | |
|---|---|---|
| 18323 | Kolagrevstur | 4.000 |
| 353083 | Til orkugrunn | 4.500 |
| 353018 | Føroya Ferðamannafelag | 250 |
| Greinin sett til | | 28.196 |

**Viðmerking:**
Arbeiðarafeløgini hava í fleiri ár biðið um, at arbeiðseftirlitinum verður loyvt at taka sær av eftirliti burturav, og at trygdarumboðsskipan verður uppbygd í samráð við arbeiðseftirlitið. Næsta ár koma stovnarnir hvør sær á fíggjarlógina.

Kolagrevstur fær í tilskoti 1,5 mió. kr., og 2,5 mió. kr. verða nýttar til fyrireikan og byrjan av rationellari koladrift og projektering av kolakraftverki.

§19 Almannamál

| | | |
|---|---|---|
| 19607 | Heimahjálparskipan | 18.153 |
| 363669 | Meginfelag teirra brekaðu | 150 |
| 363767 | Arbeiðsloysisgrunnur | 800 |
| 363715 | Føroyahús, Keypmannahavn | 250 |
| Greinin sett til | | 195.348 |

Uppskot minnilutans gevur sostatt:

| | |
|---|---|
| Meirainntøkur | kr. 61.840.000 |
| meiraútreiðslur | kr. 34.846.000 |
| munur | kr. 26.994.000 |
| meirainntøka tilsamans (+48.000) | kr. 27.042.000 |

Hesar 27 mió. kr. verða at nýta til fíggjan av hægri barnafrádrátti og persónsfrádrátti pensiónistanna. Mett at kosta umleið 18 mió. kr.

Havandi í huga, at lønjavningargrunnurin nú so ofta er í afturhond og havandi yvirtrekkið upp á 20 mió. kr. í verandi fíggjarári í huga, kunnu tær eftirverandi 9 mió. kr. styrkja landskassans likviditet nakað.

Annars hevur minnilutin um landsstýrisuppskotið ta meting, at broytti budgetteringshátturin, har lagt verður upp fyri mettan lønarvøkstur, ikki tykist tálma vøkstrinum á fíggjarlógini og als ikki røkkur setta málinum at beina burtur eykafíggjarlógirnar.

Vcrandi fíggjarlóg kemur at sýna ovnýtslu í mun til játtanina, og so verður helst komandi ár við. Tað er, eins og stovnarnir nú bert hava eitt hægri støði at ovnýta út frá.

Viðmerkjast skal eisini, at trý ára fíggjarætlan av hesum slag einki virði hevur, tá eingin verunlig budgettering liggur aftan fyri tølini. Uppskotini fyri 84/85 og 85/86 minna tá mest um tátu, ið gevur einum gomlum agitatiónsuppskoti eitt »forlorið« innihald.

Minnilutin hevur nierkt sær, at landsstýrið nú hevur hækkað kontoina til ferða- og dagpening til ta upphædd, sum nýtt varð tað árið, tá »frímerkjaviðskiftið« við útlond yvirtrekti hesa konto við kr. 700.000,-, men fyri at leggja upp fyri óvæntaðan vøkstur, eru nú aftur munandi upphæddir settar av hjá einstøku stovnunum, ið áður komu undir somu konti.

Afturat er óvanliga stórur vøkstur á øllum konti við heitinum: »Landsstýrinum at ráða yvir«.

Undirstrikast skal eisini, at risavøkstirnir í fíggjarlógartølum síðan 1980/81, tá uppskotið var 641 mió.kr. og nýtslan 665 mió.kr., lutvíst goymir slíkar yvirtøkur, at tær tyngja fitt á samlaðu upphæddunum.

Vøksturin upp á 500 mió.kr. í trý ár er so mikið stórur, at heldur hann á við somu ferð, verður helst torført at greiða rentu- og avgjaldsskyldurnar, ið fylgja av ferfeldaðari uttanlandsskuld.

Ein minniluti (Ove Mikkelsen úr Tjóðveldisflokkinum) hevur hesar viðmerkingar:

**§1 Skattir**

verður broytt til kr. 598.000.000,-, ein hækking uppá 12 mió.kr.

**Uppskot**
**til**
**samlyktar**

Áiagt verður landsstýrinum at skipa fyri eykaskatti á háinntøkur oman fyri 200.000 kr. árliga, so at skattatrýstið á láginntøkur kann lætna og omanfyri nevnda upphædd fæst til vega uttan eyka skattaálíkning á lág- og miðalinntøkur.

**§6**
Vit vilja hava postverkið at bera seg.

**§10**
10106 Løgting Staðf.
Uppskot um, at staðfesting av orðaskiftinum á tingi verður framd.

**§11**
**Landsfyrisiting**
Í staðin fyri at halda fram við at leiga høli, verða settar beinan vegin 5 mió.kr. í grunn til bygging av nýggjum húsum til alla landsfyrisitingina og undirdeildir. Sum er verða brúktar 4 mió.kr. árliga til leigu. Fyri hetta fáast hús fyri umleið 20 mió.kr.

Víst verður til, at soleiðis er gjørt bæði í Mariehamn og í Godthåb. Landsfyrisitingin vildi spart hópin av starvsfólki, tí umsitingin kundi verið munandi einfaldari.
(11953)

1 mió.kr. verða settar av til grunn til nýtt løgtingshús.
(Sjóbúðin). (11851)

## Uppskot til samtyktar

11661 Umsitingin av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini verður yvirtikin sum føroyskt sermál.

Viðmerking: Vit gjalda umsitingina, men ríkisumboðsskrivstovan umsitur hana.

**§11**
11410 Miðstøð fyri undirvísingaramboð kr. 600.000,-. Nýggj grein. Hetta varð samtykt fyri 4 árum síðani í nýggju fólkaskúlalógini. Skal avloysa skúlabókasøvnini. Ognirnar har skulu ganga inn í hesa miðstøð. Hetta sparir munandi, tí tað ikki verður neyðugt hjá skúlunum hvør sær at keypa inn.

Samstundis vil sama peningaupphædd útvega størri og fjølbroyttari bókatilfar.

§12
÷ 150.000 kr. til gamnmateljara í Klaksvík. Tá Landssjúkrahúsið fær 2 laborantar og 1 skrivara, kann tað nøkta tørvin fyri allar Føroyar á hesum øki.

12508 **Læknar**
Umnormering av konsulenti í barnasjúkum til yvirlækna í barnasjúkum við sjúkrahúsverk Føroya fyribils við tænastu á Landssjúkrahúsinum og 1/2 læknaskrivara, tað er 240.000 kr. + 55.000 kr.
Uppskot til samtyktar gjørt um hetta.

§13
**Stk. 3. Lendingar í grunn**, verður at hækka við 1 mió.kr. til 23 mió. kr. til katastrofuverjugarð í Sumba eftir góðkenning av Vega- og havnanevndini, soleiðis at næsta brimódn ikki fer við bakkanum, bæði neystum og húsum.

*Stk. 9.* + 2 mió.kr. til sekunder berghol.

§14.
313256 Ymisk framhaldsundirvísing. Verður hækkað til 50.000 kr.
14450 Nýggj grein.
Fiskivinnu- og aðrir vinnuskúlar í grunn 1 mió.kr.
313302 Ítróttar- og skúlabyggigrunnur.
Viðmerking: Mælt verður til, at skúla- og ítróttarbyggingar í framtíðini verða bygdar við størri peningaligum varðsemi og ikki sum luksushøllir og -skúlar.

§15 nr. 1551
Fiskirannsóknarstova: 400.000 kr. hækking til yvirtøku av teimum lønarpørtum, ið verða goldnir av ríkiskassanum.

**Sømdarpeningur 323086**
Verður hækkað við 5.000 kr. til vevlistakvinnuna Marionnu Matras.
Marianna Matras er undangongufólk innan hesa listagrein í Føroyum. Vit vildu fegin tikið onnur listafólk við, men í tí treysti, at møguleikarnir eru størri við bert einum uppskoti, mæla vit til omanfyri nevndu.

**§15 eyka. 323116 Skúlabókaútgáva**
Hækkast við 100.000 kr.

**323157 Útvarpssendistøðir í grunn.**
Hækkað við 5 mió. kr. til 7,5 mió. kr.

Viðmerkingar: Tað er bráðneyðugt at fáa slíkan millumbylgjusendara, soleiðis at allir landsmenn okkara á vanligum fiskileiðum kunnu hoyra Útvarpið. Verandi sendari kann brotna hvønn dag, og peningaupphæddin á fíggjarlógini førir við sær, at nýggjur sendari, sum nøktar nevnda tørv, ikki kann setast upp fyrr enn um mong ár.

**323181 Ungdóms- og bygdahús** verður hækkað við 500.000 kr. til 1 mió. kr.

Viðmerkingar: Tey bygdahús, ið bygd eru, hava havt ómetaligan týdning fyri bygdalívið og trivnaðin í bygdunum, og er tað ynskiligt, at henda menning heldur fram.

**323150 Kirkjubømúrurin** 200.000 kr.

**§16**
**16018 Vrakarastovnurin** verður hækkaður til 2 mió.kr. Eykahækkingin uppá 180.000 kr. skal nýtast til útbúgving og skeiðvirksemi fyri vraki- og góðskueftirlitsmenn.

**16208** sett niður til 100.000 kr.

**Nýggj 16209 Føroyahús í Reykjavík** 500.000 kr.
Viðmerkingar: Sjómansheimið í Reykjavík undir bygging. Avsettu 40.000 kr. muna einki til at liðugtgera tann nýggja sjómansheimsbygningin í Reykjavík, ið hevur staðið í gerð í mong ár. Við teirri nýskaptu samvinnu, sum løgtingið hevur viðtikið eigur at vera millum tær vesturnorrønu tjóðirnar, má metast, at tílíkt hús í Reykjavík umframt at tæna endamálinum sum sjómansheim eisini kann nýtast í teirri samvinnu, sum verður útbygd føroyinga og íslendinga ímillum.

**333017** Upphædd landsstýrisins verður niðursett til 155.000.000 kr.

**Nýggj grein:** Stuðul til bygging av svartkjaftavirkjum til onnur ídnaðarfremjandi endamál og til umlegging av fiskiskipum úr botnfiskiskapi til aðra fiskiveiðu. **333018** 40.000.000 kr.

§17

**17205 Royndarstøð**
Lækkað við 4 mió.kr.

§18
**18109 Arbeiðseftirlitið**
Viðmerkingar: Starvsfólkið og leiðarin á hesum stovni skulu bert arbeiða fyri arbeiðseftirlitið og ikki brúka stóran part av arbeiðstíðini sum metingarstovnur hjá landsstýrinum.

**18235 Ráðið fyri Ferðslutrygd** verður hækkað við 100.000 kr. til 350.000 kr.

**18304 Skipaskrá og -uppmáting**
Umsitingin av hesum stovni verður yvirtikin.
Uppskot til samtyktar um hesa yvirtøku.

**18343** Nýggj grein
Til framhaldsútbúgving av handverkarum verða avsettar 200.000 kr.

**353019 Ferðamannastovan**
Hækkað við 200.000 kr.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Avsettar verða 500.000 kr. til stuðul til bygdirnar til bygging av toilettmøguleikum, uppsetan av køssum til burturkast eins og rennandi vatn til ferðamannanýtslu.

**353025 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál** verður hækkað við 1 mió.kr. til 5 mió.kr.

**353042 Til Menningargrunn** verður at hækka við 2 mió.kr. til 10 mió. kr.

**353083 Til Orkugrunn** verður at lækka við 2 mió.kr. til 7 mió.kr.

§19
**19208 Barnastyrkur til stakar uppihaldarar** verður at hækka við 200.000 kr. til 1.480.000 kr.

**19607 Heimahjálparskipanin**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gera reglugerð fyri heimahjálparskipanina. Herundir fyri lønarsáttmála.

**19664 Bjálving av húsum hjá pensjónistum** verður hækkað til 4 mió.kr. úr 3 mió.kr.

**363669 Meginfelag teirra brekaðu** verður hækkað til 295.000 kr.

**363777 Næmingaheim í grunn** verður hækkað við 500.000 kr. til 1 mió.kr.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) førir fram, at samfelagið hevur eina fíggjarlóg fyri neyðini, og at uppskot landsstýrisins ikki er tað besta. FRAMBURÐSFLOKKURIN vil tí seta fram sítt egna fíggjarlógaruppskot, eins og hann gjørdi seinasta ár.

Í stórum er uppbyggingin av minniluta uppskotinum hin sama sum seinasta ár, tó við neyðugum broytingum so sum at føra tølini til dags.

Í okkara grannalondum og okkara samhandilslondum eru tey grundleggjandi sjónarmiðini og partvíst viðtøkurnar innan fíggjarpolitikkin tær, at dýrtíðin (inflatiónin) eigur at haldast innan fyri 4%. Um vit ikki hava somu viðtøkur og koyra eftir somu grundsjónarmiðum, er ikki bert vandi fyri, men so undirgrava vit okkara kappingarføri. Uppgáva tingsins í sambandi við løgtingsfíggjarlógina er eisini at bera so í bandi, at vit varðveita okkara kappingarføri.

Í seinastu fíggjarlóg var innbygt ein dýrtíð (inflatión) uppá 12,5%. Úrslitið, nú árið er av, er, at á privata økinum hevur prísvøksturin verið um 9%, meðan hann hevur verið nakað meira enn tey tilætlaðu 12,5% innan almenna sektorin. Dýrtíðin fyri samfelagið sum heild

vaks við 10,5% í meðal. Hetta er ein vøkstur, ið verið hevur, og megu vit tí viðurkenna hann. Hinvegin eiga vit at arbeiða fram móti, at vøksturin í komandi fíggjarári, ið er samráðingarár, ikki fer upp um tey í øðrum londum tilætlaðu 4%. Gera vit ikki tað, eru vit við til at undirgrava okkara egna kappingarføri.

Grundreglan í uppskoti FRAMBURÐSFLOKSINS er, at oman á roknskapartølini fyri 1981/82 á teim ymsu rakstrarstøðunum eru fyrst løgd tey 10,5%, sum tíðin dýrkaði seinasta ár, og hartil er lagdur ein vøkstur uppá omanfyri nevndu 4%. Tølini eru sostatt, undantikið har sosial- og onnur fyrilit gera annað neyðugt, roknskapartølini í uppskoti landsstýrisins, hækkað við 15%.

Verður broytingaruppskot FRAMBURÐSFLOKSINS ikki viðtikið, er ikki annað at gera enn at viðtaka tað dýrtíðarfremjandi uppskot landsstýrisins, við tað at hvørgin av hinum andstøðuflokkunum, hvørki í ár ella í fjør, hava sýnt dirvi, skil ella hegni at koma við øðrum broytingum enn »krutl«kendum smábroytingum til landsstýrisins uppskot.

Í álitinum til løgtingsfíggjarlógaruppskotið 1982/83 førdi minnilutin (framburðsflokkurin) fram, at Føroyar hava í nøkur ár riðið á eini inflatiónsbylgju, men við tað at inflatiónin uttan um okkum, og í okkara samhandilslondum, hevur verið umleið tann sama, hava vit ikki merkt so nógv til bylgjuna. Fyri okkum hevur tað sum heild sæð út, sum peningurin er minkaður í virði, og at vit hava fingið eitt endurgjald fyri minkingina.

So leingi javnvág er í prísviðurskiftunum millum umheimin (tey, vit handla við) og okkum, eiga vit ikki at gera nakað drastiskt fyri at broyta hesa javnvág í alt ov stóran mun.

Besta kappingarføri hava vit, um vit eru eitt vet aftan fyri okkara samhandilslond við dýrtíðini. Tað er tí umráðandi, at vit stýra okkara fíggjarviðurskiftum soleiðis, at vit uppnáa eitt gott og sunt kappingarføri, bæði hvat viðvíkur út- og innflutningi. Hóast eitt ávíst afturhaldni í dýrtíðini er gagnligt fyri kappingarføri, so vísa royndirnar í okkara grannalondum, at tiltøk, sum beinleiðis hava til endamáls at tvinga eina totala stagnatión á eina náttúrliga dýrkan, hava givið bakkøst í formi av stórum atbeiðsloysi og øðrum óhugnaligum eyðkennum fyri einum ósunnum samfelagi.

Hinvegin eigur ein at ansa eftir, at ikki verður birt uppundir eina dýrtíð, sum er størri enn tann, sum er í okkara samhandilslondum. Tað er júst hetta, ið hendir í øllum teim londum, har sosialdemokratiskir flokkar einsamallir koma til ræði. Fíggjarligi sorgarleikurin í Australien í 70'unum er bert eitt ræðandi dømi um hetta.

Búskaparráðið upplýsti fyri fíggjarnevndini, at bert við teim sáttmálum, sum undirskrivaðir eru higartil, so veksur okkara uttanlandsskuld við 35%. Í hesum sambandi er vert at vísa á, hvat framburðsflokkurin førdi fram í álitinum til fíggjarlógina fyri bert einum ári síðan:

Ein, ið hevur stór lán, er ikki fult harri yvir sær sjálvum, við tað at hann ikki sleppur longur, enn lángevarin vil. Tann dag ein lángevari hevur rokkið eina ávísa proportión í mun til lántakaran, hvat peningi teirra millum viðvíkur, so kann hann siga: ger so ella ger so. Tí síggja vit ein stóran vanda í tí alsamt vaksandi uttanlandslántøkuni, serstakliga frá EEC-londum. Vit skuldu helst ikki komið í ta støðu, at EEC sigur: **gjald ella inn.**

Okkara alment kenda uttanlandsskuldin passerar júst í hesum døgum milliard nummar tvey, og siga tí aftur í ár: Vit standa í dag yvir fyri spurninginum: Hvussu kunnu vit minka um uttanlandsskuldina, bøta um gjaldsjavnan, betra býtislutfallið og varðveita kappingarførið, uttan at tað gongur út yvir okkara egna arbeiðsskapandi aktivitet? Og uttan at koyra fólk í arbeiðsloysið? Og aftur í ár verður svarið:

Tað gerst við tvungnari uppsparing. Ikki hjá nøkrum einstøkum, men soleiðis at øll koma undir hana, og tað gerst best við at seta landskassan undir tvungna uppsparing.

Í uppskoti landsstýrisins er aftur í ár innbygd ein lønarhækkan í komandi fíggjarári, hvat viðvíkur almennum lønum. Seinasta ár var henda lønarhækkan, ella dýrtíð, uppá 12,5%. Men, sum altíð, tað eina glasið tekur tað næsta við sær. Hesaferð ljóðar tann innbygda dýrtíðin uppá 17,5%, ella við øðrum orðum, hálvaaðru ferð so nógv sum seinast.

Føroya løgting eigur ikki at góðkenna tílíkan rusjibanafíggjarpolitikk, ið áður bert er kendur í londum, sum eru stýrd av javnaðarflokkum einsamøllum, eitt nú í Australia, tá áðurnevndi fíggjarligi sorgarleikur fór fram, og í Týsklandi undir fólkaflokksstýrinum undan seinna heimsbardaga eins og í øðrum londum, har Fólkaflokkurin einsamallur er komin til ræði.

Í álitinum til løgtingsfíggjarlógaruppskotið 1982/83 førdi minnilutin (Framburðsflokkurin) fram, at Føroyar ikki tola tílíkan rusjibanafíggjarpolitik, við tað at hann vildi nerva okkara kappingarføri í so stóran mun, at vandi var fyri, at vit komu út í eitt stórt arbeiðsloysi komandi árini. Longu nú merkist rákin av hesum arbeiðsloysi. Landsstýrisuppskotið kemur bert at skunda undir gongdina til tað verra.

Verður minnilutauppskotið samtykt, má roknast við einum so góðum kappingarføri beinanvegin, at arbeiðsloysið fer í botn, eins og roknast

má við eini stórari lønarhækkan millum arbeiðsfólk og handverkarar sum fylgja av, at periodurnar við ongum arbeiði minka niður í eitt minimum.

Lønarvøksturin í tí privata sektorinum vil gerast so stórur, at inntøkutøl landsstýrisins fara at halda og kanska gott og væl tað.

Eins og seinasta ár miðar uppskot Framburðsfloksins ímóti
1) at fáa fleiri arbeiðspláss
2) at vaksa tímatalið á verandi arbeiðsplássum
3) at fremja eina tvungna uppsparing (landskassans)
4) og harvið gera okkum meira sjálvbjargin
5) at minka um uttanlandsskuldina
6) at bøta um gjaldsjavnan og
7) at betra býtislutfallið millum út- og innflutning.

Minnilutin hevur uppskot um beinleiðis at avseta kr. 119 milliónir til tvungna uppsparing, og viðmerkjast skal, at hetta ikki minkar um aktivitetin, hvørki almenna ella privata, við so mikið sum einum einasta arbeiðsplássi.

Sannast má, at hetta mynstrið kann fylgjast og vaksast soleiðis, at um heilt fá ár kann §27 **Landskassans tvungna uppsparing** fara upp á 200 til 250 mill. kr., men innan hetta kann lata seg gera, verður neyðugt at útvega arbeiðspláss í privata sektorinum til tey, ið megu fara úr almennum arbeiði. Hetta er nakað, sum vil koma nærum av sær sjálvum við at samtykkja minnilutauppskotið, við tað at ein tílík fíggjarlóg aftur vil vekja tað neyðuga álitið til land okkara og til framtíðina millum okkara vinnulívsfólk.

Flokkurin hevur beinleiðis uppskot um at avseta pening til ein vinnuskúla í Eysturoy; er politiskur vilji til staðar, kann ein tílíkur skúli koma longu til heystar og harvið minka um peningatørvin á studentaskúlum og HF-skeiðum. Við tað at tílíkur skúli eigur at skipast soleiðis, at størri helmingurin av lærutíðini verður á vanligum arbeiðsplássum, er ikki neyðugt við størri íløgum enn tað, spart verður á Studentaskúlanum í Eysturoy og HF-skeiði í Klaksvík.

Ein onnur broyting, sum flokkurin hevur sett á fíggjarlógina, er arbeiðsloysisgrunnur fyri fiski- og útróðrarmenn. Her reisir seg spurningurin, um hesir (útróðrarmenn) ikki verða noyddir at upparbeiða egnu arbeiðsloysis- og atløgutrygging, orsakað av illvilja løgtingsins fyri at lata teir fáa undir seg tað sosiala trygdarnetið, sum minstaløthings átti at verið teimum.

Játtanin til dagpeningaskipanina hevur flokkurin hækkað, og

kemst hetta av, at flokkurin hevur samtykt at framleggja eitt broytingaruppskot til 5-viku skeiðið, soleiðis at dagpeningaskipanin gerst meira rættvís og meira sosialt sannroynandi. Ætlanin er at koma við hesum uppskoti longu í hesi tingsetu.

Fyri at broytingarnar, sum Framburðsflokkurin hevur gjørt, ikki skulu nerva nakað arbeiðspláss, hvørki privat ella alment, verður lánheimildin í §41 hækkað við 14 mill. kr.

Viðvíkjandi §13.2 so metir minnilutin, at tíðin er inni, at tey arbeiði, sum vit nú gera yvir t.d. 12 mð., eiga í staðin at verða útført yvir t.d. 18 mð., fyri at avtrappingin á hesum øki ikki skal gerast ov kortfreistað. Hækkanin av lánheimildini í §41 1.a. er ætlað til lendingar.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) setir tí fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

**Broytingaruppskot**

| | | Útreiðslur Udgifter kr. | Uppskot frá Framb. og Flskivinnufl. |
|---|---|---|---|
| §10. | Løgtingið ..... Lagtinget | 8.453.000 | 8.453.000 |
| §11. | Landsumsitingin ..... Landsadministrationen | 70.890.000 | 56.266.000 |
| §12. | Heilsumál ..... Sundhedsvæsenet | 85.015.000 | 77.077.000 |
| §13. | Samferðslumál ..... Kommunikationsvæsen | 162.800.000 | 123.900.000 |
| §14. | Skúlamál ..... Undervisningsvæsen | 96.714.000 | 91.950.000 |
| §15. | Vísindi, bókmentir og list .... Videnskab, litteratur og kunst | 41.708.000 | 30.120.000 |
| §16. | Fiskivinna, sigling o.t. ..... Fiskeri, søfart o.l. | 253.018.000 | 250.415.000 |
| §17. | Landbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering | 28.704.000 | 20.144.000 |
| §18. | Handil, ídnaður v.m. ..... Handel, industri m.v. | 29.646.000 | 20.015.000 |
| §19. | Almenn forsorg ..... Socialvæsen | 191.753.000 | 171.114.000 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| §20. | Pensjónsútreiðslur ..... Pensionsudgifter | 3.465.000 | 3.465.000 |
| §21. | Effektivar veðhaldsbindingar . Effektive garantiforpligtelser .. | 10.000.000 | 10.000.000 |
| §22. | Aðrar og óvissar útreiðslur ... Andre og uvisse udgifter | 1.620.000 | 1.620.000 |
| §23. | At leggja í ymsar grunnar v.m.. Henlæggelser til forskellige fonds m.v. | ÷ 35.168.000 | ÷ 35.168.000 |
| §24. | Avdráttur av lánum ..... Afdrag på lån | 0 | 0 |
| §25. | Avskrivingar ..... Afskrivninger | 51.257.000 | 52.257.000 |
| §26. | Ymsar ognarútreiðslur ..... Diverse ejendomsudgifter | 150.000 | 150.000 |
| §27. | Landskassans tvungna uppsparing | | 119.247.000 |
| | Tilsamans | | 1.001.025.000 |
| | Nettoinntøka | | 1.001.073.000 |
| | Meirinntøka | | 48.000 |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| §11. | Landsfyrisitingin: | | | | |
| | Landsadministrationen: | | | | |
| 11015 | Løgmaður og landsstýri<br>Lagmand og landsstyre | 1.343 | 1.515 | 1.481 | |
| 11053 | Landsskrivstova .....<br>Landskontor | 4.794 | 5.252 | 5.800 | 5.513 |
| 11103 | Fiskivinnustova .....<br>Fiskerikontor | 592 | 655 | 700 | 680 |
| 11155 | Uttanríkistænasta í Aberdeen ...<br>Udenrigstjeneste i Aberdeen | 351 | 374 | 408 | |
| 11205 | Uttanríkistænasta í København ..<br>Udenrigstjeneste i København | 439 | 460 | 557 | |
| 11257 | Líkningarráð .....<br>Ligningsråd | 2.707 | 3.084 | 4.344 | 3.113 |
| 11262 | Samtíðarskattaskipan<br>Kildeskatteordning | — | — | 7.393 | 1.000 |
| 11276 | Dataeftirlit .....<br>Datakontrol | — | — | 175 | |
| 11307 | Manntalsstova .....<br>Folkeregister | 462 | 868 | 749 | 531 |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 11359 | Almannastova ..... Socialforvaltning | 2.924 | 3.714 | 4.920 | 3.363 |
| 11409 | Landsskúlafyrisitingin ..... Landsadministrationen | 3.690 | 5.440 | 6.998 | 4.244 |
| 11452 | Føroya Gjaldstova ..... Færøernes oppebørselskontor | 12.799 | 12.003 | 15.385 | 14.719 |
| 11466 | Gjaldstovudeild í Klaksvík ..... Oppebørselsfilial i Klaksvik | 598 | 635 | 663 | |
| 11471 | Gjaldstovudeild í Saltangará Oppebørselsfilial i Saltangará | 432 | 500 | 530 | 497 |
| 11485 | Gjaldstovudeild í Fuglafirði .... Oppebørselsfilial i Fuglafirði | 276 | 345 | 413 | 317 |
| 11499 | Gjaldstovudeild á Tvøroyri..... Oppebørselsfilial i Tvøroyri | 404 | 465 | 488 | 465 |
| 11502 | Gjaldstovudeild í Vági ..... Oppebørselsfilial i Vági | 362 | 339 | 387 | |
| 11516 | Gjaldstovudeild í Sørvági ..... Oppebørselsfilial i Sørvági | 286 | 322 | 375 | 329 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 11549 | Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald ..... Kontorholdsgodtgørelse til syslerne | 7 | 40 | 40 | |
| 11554 | Tolleftirlit ..... Toldvæsen | 2.375 | 2.611 | 2.937 | 2.731 |
| 11604 | Valuta- og prísráð ..... Valuta- og prisråd | 635 | 860 | 887 | 730 |
| 11656 | Lønarráð ..... Lønningsråd | 4 | 6 | 6 | |
| 11661 | Heilsu- og heimasjúkrasystra-umsitingin Administration af sundheds- og hjemmesygeplejeordningen | — | — | 317 | |
| 11706 | Búskaparráð ..... Økonomisk råd | 1.391 | 1.753 | 1.995 | 1.600 |
| 11758 | Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands ..... Rejse- og dagpenge inden- og udenlands | 2.122 | 1.750 | 2.200 | |
| 11808 | Innheintingarútreiðslur ..... Udgifter ved inkasso | 35 | 50 | 50 | |
| 11851 | Ognin Tinganes ..... Ejendommen Tinganes | 1.104 | 1.274 | 1.613 | 1.270 |
| 11901 | Landsverkfrøðingsskrivstova ... Landsingeniørens kontor | 6.817 | 7.100 | 8.079 | 7.840 |
| 11953 | Umsitingarhús í grunn ..... Administrationsbygning i fond | — | 1.000 | 1.000 | |
| | | 46.949 | 52.415 | 70.890 | 56.266 |

| | | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §12. | | Heilsmál:<br>Sundhedsvæsen: | | | | |
| | 12109 | Landssjúkrahúsið (D.A.H.)<br>Landssygehuset (D.A.H.) | 45.058 | 50.831 | 57.391 | 51.817 |
| | 12202 | Klaksvíkar sjúkrahús .....<br>Klaksvík sygehus | 11.019 | 12.407 | 14.210 | 12.672 |
| | 12304 | Suðuroyar sjúkrahús .....<br>Suderø sygehus | 5.639 | 5.986 | 6.901 | 6.485 |
| | 12406 | Heilsumiðstøðir í grunn .....<br>Sundhedscentre, henlagt i fonds | 1.000 | 1.000 | 1.000 | |
| | 12508 | Læknar .....<br>Læger | 391 | 464 | 516 | |
| | 12601 | Ljósmøður .....<br>Jordemødre | 446 | 488 | 1.122 | |
| | 12653 | Heilsu- og heimasjúkrasystraskipan<br>Sundheds- og hjemmesygeplejeordning | 385 | 1.046 | 2.760 | 2.350 |
| | 12672 | Skúlalæknaskipan .....<br>Skolelægeordning | — | — | 267 | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12907 | Ymiskar útreiðslur:<br>Diverse udgifter: | | | | |
| 303011 | Farsóttir ..... | 25 | 30 | 45 | |
| | Epidemiske sygdomme | | | | |
| 303028 | Karantenuútreiðslur ..... | 0 | 1 | 1 | |
| | Karantæneudgifter | | | | |
| 303036 | Sjúkrahjálp ..... | 2 | 2 | 2 | |
| | Sygehjælp | | | | |
| 303044 | Hvíldarheimið »Naina« ..... | 350 | 350 | 500 | |
| | Hvilehjemmet »Naina« | | | | |
| 303052 | Blákrossstovan ..... | — | — | 300 | |
| | Blákrosstovan | | | | |
| | | 64.315 | 72.605 | 85.015 | 77.077 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| §13. | Samferðslumál:<br>Kommunikationsvæsen: | | | | |
| 1 | Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av veguun ..... | 52.400 | 51.300 | 59.000 | |
| | Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje | | | | |
| 2 | Havnagerð, í grunn ..... | 25.000 | 40.000 | 48.800 | 28.750 |
| | Havnebygning, henlægges i fond | | | | |
| 3 | Lendingar, í grunn ..... | 17.500 | 24.700 | 22.000 | 20.000 |
| | Landingspladser, henlægges i fond | | | | |
| 4 | Flogferðsla, í grunn ..... | 1.000 | 2.500 | 3.500 | 1.150 |
| | Flyvetrafik, henlagt i fond | | | | |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Berghols- og brúgvagerð, í grunn . Tunnel- og brobygning, henlagt i fond | 4.000 | 6.000 | 14.000 | 5.000 |
| 7 | Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn (viðm.)..... Tilskud til kommuner til asfaltering, henlagt i fond (anm.) | 3.500 | 6.500 | 6.500 | 4.000 |
| 8 | Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins ..... Postvæsenets bygge- og driftsfond | 5.800 | 5.000 | 4.000 | |
| 9 | Sekunder berghol í grunn ..... Sekundære tunneller henlagt i fond | — | 5.000 | 5.000 | 2.000 |
| | | 109.200 | 141.000 | 162.800 | 123.900 |

**Viðmerkingar til §13.7**

Kommununrnar eiga kr. 150,- pr. íbúgva pr. ár í mun til fólkatalið við seinastu fólkateljing.

**Anmærkninger til § 13.7**

Kommunerne tildeles kr. 150 pr. beboer pr. år i forhold til befolkningstallet ved den seneste folketælling.

| § 14. | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | *Skúlamál:* | | | | |
| | | *Undervisningsvæsen:* | | | | |
| | 14053 | Felagsútreiðslur fyri skúlaverk. . | 117 | 338 | 605 | 352 |
| | | Fællesudgifter for skolevæsenet | | | | |
| | 14103 | Fólkaskúlin ..... | 40.307 | 41.675 | 45.241 | |
| | | Folkeskolen | | | | |
| | 14155 | H.F. skeið í Suðuroy ..... | 2.373 | 2.437 | 2.665 | |
| | | H.F. kursus på Suðuroy | | | | |
| | 14174 | Studentaskúlin í Eysturoy | 3.157 | 3.893 | 10.524 | 6.000 |
| | | og H.F. skeið í Klaksvík ..... | | | | |
| | | Gymnasium og H.F. kursus | | | | |
| | | i Eysturoy og Klaksvík | | | | |
| | | Vinnuskúli í Eysturoy ..... | | | | 4.500 |
| | | Erhvervsskole i Eysturoy | | | | |
| | 14205 | Studentaskúli og H.F. skeið | | | | |
| | | í Hoydølum ..... | 11.441 | 12.916 | 16.036 | 13.157 |
| | | Gymnasium og H.F. kursus | | | | |
| | | i Hoydølum | | | | |
| | 14257 | Kostdeild Studentaskúlans .... | 1.513 | 1.529 | 2.152 | 1.740 |
| | | Studenterskolens kostafdeling | | | | |
| | 14307 | Føroya sjómansskúli ..... | 3.220 | 4.140 | 4.300 | |
| | | Færøernes Navigationsskole | | | | |
| | 14409 | Klaksvíkar sjómansskúli ..... | 784 | 1.355 | 1.300 | |
| | | Klaksvik navigationsskole | | | | |
| | 14502 | Føroya Fólkaháskúli (viðm.) | 1.345 | 1.318 | 1.762 | |
| | | Færøernes Folkehøjskole (anm.) | | | | |
| | 14554 | Húsarhaldsskúlar ..... | 351 | 523 | 430 | |
| | | Husholdningsskoler | | | | |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 14604 | Kvøldskúlar ..... Aftenskoler | 1.273 | 1.365 | 1.563 | |
| 14901 | *Ítrótt:* | | | | |
| | *Idræt:* | | | | |
| 313103 | Lánsgr. til ítróttaranl. ..... Lånefond til idrætsanlæg | 100 | 100 | 100 | |
| 313128 | Studn. til Í.S.F. (viðm.) ..... Tilskud til Í.S.F. (anm.) | 850 | 1.000 | 1.250 | 1.500 |
| 313136 | Studn. til ferðir innanoyggja ... Tilskud til indenlands rejser | 633 | 450 | 500 | |
| 14953 | *Ymiskir studningar:* | | | | |
| | *Diverse tilskud:* | | | | |
| 313152 | Grunnur til lærdan lestur ..... Studiefond | 450 | 450 | 880 | 520 |
| 313177 | Gr. til annan lestur ..... Fond til anden læsning | 150 | 150 | 175 | |
| 313215 | Lærlingar ..... Lærlinge | 200 | 200 | 200 | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 313223 | Landbúnaðarnæmingar ..... Landbrugselever | 23 | 35 | 40 | |
| 313256 | Ymisk framhaldsundirv ..... Diverse fortsættelsunderv. | 14 | 10 | 15 | |
| 313264 | Skúlabarnaferðir uttanlands ... Skolebørns rejser udenlands | 60 | 60 | 60 | |
| 313272 | Skúlabarnaferðir innanoyggja ... Skolebørns rejser indenlands | 353 | 400 | 450 | 410 |
| 313302 | Ítróttar- og skúlabyggigr..... Idræts- og skolebyggefond | 8.588 | 5.000 | 5.000 | |
| 313319 | Sjómansskúli í grunn ..... Navigationsskole i fond | — | — | 500 | 0 |
| 313335 | Studentaskúli í Hoyd. í grunn .. Gymnasium i Hoyd. henl. i fond | — | — | 500 | 0 |
| 313351 | Næmingastudningur til listamenn ..... Tilskud til kunstneres uddannelse | 30 | 30 | 35 | |
| 313368 | Føroya skúlasavn ..... Færøernes skolesamling | 70 | 70 | 70 | |
| 313376 | Meginfelag føroysku Studenta og Meginfelag føroyinga undir útbúgving ..... | 45 | 50 | 85 | 52 |
| 313384 | Norrøna Felagið ..... Norrøna Fleagið | 20 | 25 | 25 | |
| 313406 | Studningur til fremmand, ið lesa í Føroyum ..... Tilskud til ikke-færinger, der studerer på Færøerne | 18 | 20 | 25 | |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 313422 | Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir ..... Landsskoleadministrationen at råde over | — | 17 | 26 | |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir .... Landsstyret at råde over | 155 | 150 | 200 | 187 |
| | | 77.640 | 79.706 | 96.714 | 91.950 |

**Viðmerkingar**
**til § 14.14502**

Herav kr. 60.000,- árliga í 10 ár studningur til rindan av lánum. Hetta er 6. gjald.

**til § 14.14901/313128**

Herav kr. 50.000,- at býta til bóltfeløgini til venjarar.

**Anmærkninger**
**til § 14.14502**

Heraf kr. 60.000,- pr. år til tilskud til betaling af lån. Dette er 6. rate.

**til § 14.14901/313128**

Heraf kr. 50.000,- at fordele imellem boldklubberne til trænere.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| §15. | *Vísindi, bókmentir og list:*<br>*Videnskab, litteratur og kunst:* | | | | |
| 15109 | Landsbókasavn .....<br>Landsbibliotek | 1.737 | 2.221 | 2.492 | 1.998 |
| 15202 | Fólkabókasøvn .....<br>Folkebiblioteker | 2.145 | 2.527 | 3.332 | 2.467 |
| 15304 | Landsskjalasavn .....<br>Landsarkiv | 706 | 789 | 1.083 | 812 |
| 15406 | Føroya Fornminnissavn .....<br>Færøernes museum | 2.260 | 2.740 | 3.185 | 2.599 |
| 15508 | Bygdasøvn .....<br>Bygdemuseer | 109 | 150 | 348 | |
| 15551 | Fiskirannsóknarstova .....<br>Fiskeribiologisk laboratorium | 5.298 | 6.670 | 9.047 | 6.093 |
| 15653 | Fuglakanningarstøð v.m. .....<br>Ornitologisk station m.v. | 68 | 18 | 20 | |
| 15703 | Náttúrugripasavn .....<br>Naturhistorisk samling | 920 | 994 | 1.425 | 1.058 |
| 15717 | Danmarks Geologiske unders. ....<br>DGU | 244 | 310 | 415 | 281 |
| 15755 | Fróðskaparsetur Føroya .....<br>Færøernes Akademi | 3.645 | 4.145 | 4.657 | 4.192 |
| 15793 | Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur) .....<br>Institutioner på Debesartrøð (fællesudgifter) | 836 | 1.068 | 1.147 | 961 |
| 15805 | Heilsufrøðilig starvsstova .....<br>Hygiejnisk laboratorium | 1.317 | 1.407 | 1.876 | 1.515 |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 15857 | Náttúrufriðingarnevndir ..... | 148 | 80 | 100 | |
| | Naturfredningsudvalg | | | | |
| 15895 | Tónleikur og sangur ..... | 330 | 600 | 675 | |
| | Musik og sang | | | | |
| 15907 | *Ymiskir studningar:* | | | | |
| | *Diverse tilskud:* | | | | |
| 323012 | Barnabløð ..... | 15 | 20 | 30 | |
| | Børneblade | | | | |
| 323037 | Sjónleikur ..... | 150 | 200 | 250 | |
| | Teater | | | | |
| 323053 | Til útgávu av barnabókum ..... | 350 | 500 | 450 | |
| | Til udgivelse af børnebøger | | | | |
| 332086 | Sømdarpeningur til skald og listamenn (viðm.) ..... | 48 | 51 | 85 | 0 |
| | Hædersgaver til digtere og kunstnere (anm.) | | | | |
| 323108 | Lán og stud.gr. til bókaútg. ..... | 100 | 100 | 100 | |
| | Låne- og tilskudsf. til udg. af bøger | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 323116 | Skúlabókaútgáva ..... | 600 | 700 | 800 | |
| | Udgivelse af skolebøger | | | | |
| 323124 | Norðurlandahús, í grunn ..... | 1.000 | 1.000 | 5.770 | 1.000 |
| | Nordisk hus, henl. i fond | | | | |
| 323132 | Sjónleikarhús, í grunn ..... | 75 | 75 | 75 | |
| | Teatre, henlægges i fond | | | | |
| 323149 | Fornminnissavn, í grunn ..... | 200 | 200 | 200 | |
| | Museum, henl. i fond | | | | |
| 323157 | Útvarpssendistøðir í grunn .... | — | — | 2.500 | |
| | Radiosender henl. i fond | | | | |
| 323165 | Rakstur av Bókamiðsøluni .... | 220 | 220 | 250 | |
| | Drift af Bókamiðsølan | | | | |
| 323173 | Orðabókaútgáva í grunn ..... | 75 | 75 | 96 | |
| | Udgivelse af bøger henl. i fond | | | | |
| 323181 | Ungdóms- og bygdahús í grunn .. | — | — | 500 | |
| | Ungdoms- og bygdehus henl. i fond | | | | |
| 323228 | Mentunargrunnurin (MFL) .... | — | 200 | 200 | |
| | Kulturfonden (MFL) | | | | |
| 323236 | Føroya Listasavn v.m. ..... | 150 | 1.118 | 200 | |
| | Færøernes kunstsamling v.m. | | | | |
| 323244 | Savn í Hoyvík í grunn ..... | — | 500 | 250 | |
| | Museum i Hoyvík henl. i fond | | | | |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir .... | 80 | 100 | 150 | 100 |
| | Landsstyret at råde over | | | | |
| | | 22.826 | 28.778 | 41.708 | 30.120 |

| | | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §16. | | *Fiskivinna, sigling o.t.:* | | | | |
| | | *Fiskeri, søfart o.l.:* | | | | |
| | 16018 | Vrakarastovnur ..... | 1.525 | 1.686 | 1.820 | 1.754 |
| | | Vragerinstitution | | | | |
| | 16106 | Nautiskt royndarkamar ..... | 7 | 35 | 17 | |
| | | Nautisk prøvekammer | | | | |
| | 16208 | Sjómansheim ..... | 140 | 140 | 140 | |
| | | Sømandshjem | | | | |
| | 16301 | Vaktar- og bjargingarskip ..... | 12.439 | 12.901 | 14.268 | |
| | | Vagt- og bjergningsskib | | | | |
| | 16403 | Laksa- og sílaaling ..... | 1.026 | 800 | 1.000 | |
| | | Lakse- og ørreddrift | | | | |
| | 16505 | Prísásetingarnevndir fyri fisk .. | 139 | 100 | 100 | |
| | | Udvalg til fastsættelse af fiskepriser | | | | |
| | 16607 | Fiskivinnuráð ..... | 131 | 223 | 223 | 150 |
| | | Fiskeriråd | | | | |
| | 16904 | *Aðrir studningar:* | | | | |
| | | *Andre tilskud:* | | | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 333011 | Kanning av dálking í samb. við laksa- og sílaaling ..... Undersøgelse af forurening i forb. med lakse- og ørreddrift | — | — | 400 | | |
| 333017 | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna ..... Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet | 204.509 | 203.000 | 203.000 | | |
| 333025 | Studn. til grunnin til endurn. av fiski- og farmaskipaflotanum ... Tilskud til fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibe | 12.000 | 12.000 | 25.000 | | |
| 333033 | Grindir ..... Grindefangst | 87 | 25 | 50 | | |
| 333074 | Prakt. fiskiroyndir (viðm.) .... Praktiske fiskeriforsøg (anm.) | 2.640 | 5.500 | 5.500 | 3.036 | |
| 333082 | Vaktarskip, í grunn ..... Vagtskib, henl. i fond | 100 | 100 | 100 | | |
| 333099 | Útróðrarstøðir, í grunn ..... Hjemmefiskeristationer, henlagt i fond | 1.000 | 1.000 | 1.000 | | |
| 333104 | Trygdargrunnur veiðimanna ... Fiskernes garantifond | 0 | 200 | 200 | | |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir .... Landsstyret at råde over | 334 | 100 | 200 | | |
| | | 236.077 | 237.810 | 253.018 | 250.415 | |

**Viðmerkingar**
**til § 16.16904/333074**

Praktiskar fiskiroyndir verða gjørdar í samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd.

**Anmærkninger**
**til § 16.16904/333074**

Praktiske fiskeriforsøg udføres i samråd med lagtingets fiskeriudvalg.

| | | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §17. | | *Landbúnaður og matrikulering:*<br>*Landbrug og matrikulering:* | | | | |
| | 17015 | Landsdjóralæknaembætið ....<br>Landsdyrelægeembedet | 498 | 508 | 591 | 573 |
| | 17048 | Landbúnaðarráðgevari .....<br>Landbrugskonsulent | 210 | 244 | 273 | 242 |
| | 17053 | Seyðaráðgevari og seyðaroyndir .<br>Fåreavlskonsulent og fåreavlsforsøg | 124 | 119 | 135 | 143 |
| | 17103 | Útskifting og matrikulstova ....<br>Udskiftning og matrikelk. | 3.425 | 3.939 | 4.594 | 3.939 |
| | 17205 | Royndarstøð .....<br>Forsøgstation | 952 | 1.437 | 6.670 | 1.095 |
| | 17901 | *Aðrir studningar:*<br>*Andre tilskud:* | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 343013 | Húsdjóraaling ..... | 200 | 225 | 230 | |
| | Husdyreopdrætning | | | | |
| 343021 | Nýdyrking v.m. ..... | 1.500 | 1.500 | 2.000 | |
| | Nyopdyrkning m.v. | | | | |
| 343038 | Rentustudningur til landbúnaðarlán ..... | 1.000 | 1.700 | 2.000 | 1.150 |
| | Rentetilskud til landbrugsl. | | | | |
| 343046 | Studningur til ílegging í landbúnaðin (viðm.) ..... | 3.000 | 3.500 | 3.800 | 3.450 |
| | Finansieringstilskud til landbruget (anm.) | | | | |
| 343054 | Studningur til mjólkarframleiðslu | 4.850 | 5.850 | 6.486 | 5.640 |
| | Tilskud til mælkeproduktion | | | | |
| 343062 | Studningur til súrhoyggjbrunnar . | 800 | 875 | 950 | 920 |
| | Tilskud til græssiloer | | | | |
| 343079 | Træplanting ..... | 545 | 700 | 790 | 627 |
| | Plantning af træer | | | | |
| 343087 | Skeiðvirksemi ..... | 2 | 75 | 85 | |
| | Kursusvirksomhed | | | | |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir .... | 33 | 80 | 100 | 50 |
| | Til landsstyret at råde over | | | | |
| | | 17.139 | 20.752 | 28.704 | 20.144 |

**Viðmerkingar**
**til § 17.17901/343046**

Játtanin verður tó ikki at nýta til sethúsabygging.

**Anmærkninger**
**til § 17.17901/343046**

Bevillingen må dog ikke anvendes til opførelse af beboelseshuse.

| | | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §18. | | **Handil, íðnaður o.t.:**<br>**Handel, industri m.v.:** | | | | |
| | 18109 | Arbeiðseftirlit .....<br>Arbejdstilsyn | 796 | 1.026 | 1.299 | 915 |
| | 18152 | Brandvenjingarstøðin við Áir ..<br>Brandtræningstationen | 227 | 416 | 126 | |
| | 18202 | Bileftirlit .....<br>Biltilsyn | 534 | 1.724 | 1.960 | 1.614 |
| | 18216 | Radioeftirlit .....<br>Radiotilsyn | 175 | 250 | 275 | |
| | 18235 | Ráðið fyri ferðslutrygd .....<br>Rådet for færdselssikkerhed | 200 | 250 | 250 | 350 |
| | 18268 | Filmseftirlitið .....<br>Filmstilsynet | 148 | 135 | 152 | 300 |
| | 18304 | Skipaskrá og -uppmáting .....<br>Skibsregistrering og -opmål. | 80 | 25 | 25 | |
| | 18318 | Semingsmannaskipan .....<br>Forligsinstitution | 86 | 51 | 58 | |
| | 18323 | Kolagrevstur .....<br>Kulbrydning | 931 | 700 | 1.000 | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 18337 | Læruráðið ..... Lærerådet | 109 | 286 | 306 | |
| 18342 | Skeiðvirksemi ..... Kursusvirksomhed | 134 | 115 | 120 | |
| 18907 | *Aðrir studningar:* *Diverse tilskud:* | | | | |
| 353018 | Føroya Ferðamannafelag ..... Færøernes Turistforening | 150 | 200 | 200 | |
| 353026 | Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál (viðm.) ..... Støtte til industrifremmende formål (anm.) | 1.013 | 3.500 | 4.000 | |
| 353034 | At leggja í gistingarhúsgrunnin .. Henlæggelse i hotelfonden | 600 | 600 | 600 | |
| 353042 | Til menningargrunn ..... Til udviklingsfond | 8.000 | 8.000 | 8.000 | |
| 353067 | Studningur til meistarar ..... Tilskud til mestre | 1.309 | 2.000 | 2.000 | |
| 353083 | Til orkugrunn ..... Til energifond | — | 9.000 | 9.000 | 0 |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir .... Landsstyret at råde over | 110 | 275 | 275 | 126 |
| | | 14.602 | 28.553 | 29.656 | 20.015 |

**Viðmerkingar**

**Til § 18-18907/353026**

Verður saman við avlopi 1982/83 umlagt til grunn, sum landsstýrið saman við fíggjarnevndini ræður yvir.

**Anmærkninger**

Omlægges tilligemed restbevilling 1982/83, som landsstyret sammen med finansudvalget råder over.

| | | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðsfloksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 19. | | **Almannamál v.m.:** | | | | |
| | | **Socialvæsen m.v.:** | | | | |
| | 19056 | Fólkapensión ..... | 52.325 | 69.500 | 79.245 | 73.726 |
| | | Folkepension | | | | |
| | 19106 | Avlamispensión ..... | 20.363 | 23.750 | 28.010 | 25.194 |
| | | Invalidepension | | | | |
| | 19208 | Barnastyrkur til stakar uppi-haldarar ..... | 1.384 | 1.475 | 1.280 | |
| | | Børnebidrag til enlige forsørgere | | | | |
| | 19301 | Einkjupensión ..... | 2.311 | 2.565 | 2.530 | |
| | | Enkepension | | | | |
| | 19403 | Vanlig forsorg ..... | 1.389 | 2.415 | 7.810 | 2.562 |
| | | Almindelig forsorg | | | | |
| | 19455 | Víðkað hjálp | 1.235 | 1.110 | 2.085 | 1.420 |
| | | Udvidet hjælp | | | | |
| | 19505 | Einkjuhjálp ..... | 2.697 | 2.960 | 3.560 | 3.102 |
| | | Enkehjælp | | | | |
| | 19557 | Barnaforsorg ..... | 3.406 | 3.095 | 3.915 | |
| | | Børneforsorg | | | | |
| | 19607 | Heimahjálparskipanin ..... | 11.552 | 13.000 | 15.153 | 13.285 |
| | | Hjemmehjælpsordningen | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 19569 | Dagpeningaskipan ..... | 8.857 | 8.785 | 11.695 | 13.000 |
| | Dagpengeordning | | | | |
| 19664 | Bjálving av húsum hjá pensionistum ..... | — | 3.000 | 3.000 | |
| | Isolering af pensionistboliger | | | | |
| 19752 | Brennistudn. til pensionist. .... | 3.596 | 3.500 | 3.700 | |
| | Brændselstilskud til pensionister | | | | |
| 19904 | *Ymsir studningar:* | | | | |
| | *Forskellige tilskud:* | | | | |
| 363603 | Styrkveiting ..... | 120 | 150 | 150 | |
| | Understøttelse | | | | |
| 363611 | Ellisheim ..... | 751 | 800 | 1.200 | |
| | Alderdomshjem | | | | |
| 363628 | Endurbúgving (herundir Alv) .. | 360 | 600 | 600 | |
| | Revalidering (herund. Alv) | | | | |
| 363636 | Fráhaldsfeløg ..... | 330 | 300 | 300 | 380 |
| | Afholdsforeninger | | | | |
| 363644 | »Reyði Krossur« ..... | 10 | 10 | 10 | 30 |
| | »Reyði Krossur« | | | | |
| 363652 | Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn ..... | 125 | 125 | 150 | |
| | Fonden for uarbejdsdygtige fiskere | | | | |
| 363669 | Meginfelag teirra brekaðu ..... | — | — | 80 | |
| | Meginfelag teirra brekaðu | | | | |
| 363685 | Húsalánsgrunnur ..... | 10.000 | 10.000 | 10.000 | |
| | Huselånsfond | | | | |

| | | Roknskapur 1981/82 kr. (1.000) | Játtan 1982/83 kr. (1.000) | Uppskot landsstýris. 1983/84 kr. (1.000) | Broytingar-uppskot Framburðs-floksins 1983/84 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 363693 | Kommunalur lángrunnur ..... Kommunal lånefond | 1.000 | 1.000 | 1.000 | |
| 363707 | Arbeiðsloysisgrunnur arbeiðara-felaga ..... Arbejderforeningers arbejdsløs-hedsfonds | 375 | 400 | 400 | 500 |
| | Arbeiðsloysisgrunnur fiski- og útróðrarmanna ..... Hav- og hjemmefiskernes arbejdsløshedsfonds | | | | 500 |
| 363715 | Føroyahús í København í grunn . Føroyahús i København henl. i fond | 50 | 275 | 125 | |
| 363731 | Ansingar- og røktarheim í grunn . Opholds- og plejehjem henl. i fond | 1.000 | 1.000 | 11.000 | 5.000 |
| 363748 | Íbúðargrunnur ..... Boligfond | 1.500 | 1.500 | 1.500 | |
| 363756 | Rentustudningur til húsabygging . Rentetilskud til beboelseshuse | 13 | 25 | 25 | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 363777 | Næmingaheim í grunn ..... | — | — | 500 | |
| | | Elevboliger henl. i fond | | | | |
| | 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir .... | 199 | 350 | 300 | 230 |
| | | Til landsstyret at råde over | | | | |
| | 19918 | Skúlin á Trøðni ..... | 2.109 | 2.112 | 2.430 | |
| | | Skolen á Trøðni | | | | |
| | | | 127.057 | 153.802 | 191.753 | 171.114 |
| §26. | | **Ymsar ognarútreiðslur:** | | | | |
| | | **Diverse ejendomsudgifter:** | | | | |
| | 26305 | Ymsar ognarútreiðslur ..... | 101 | 150 | 150 | 150 |
| | | Diverse ejendomsudgifter | | | | |
| §27. | | **Landskassans tvungna uppsparing** ..... | | | 119.247 | |
| §41. | | **Lán:** | | | | |
| | | **Lán** | | | | |
| | 1 | Avdráttur ..... | | | | 0 |
| | | Afdrag | | | | |
| | 2 | *Nýupptikin lán:* | | | | |
| | | *Nyoptagne lån:* | | | | |
| | | 1. Til vegir og havnir o.t. ..... | | | 45.000.000 | |
| | | Til veje og havne o.l. | | | | |
| | | 1b. Til tunnilgerð ..... | | | 12.000.000 | |
| | | 2. Onnur lán ..... | | | 9.000.000 | |
| | | Andre lån | | | | |
| | | | | | 66.000.000 | 0 |

25. mars legði meirilutin í fíggjarnevndini (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg, Asbjørn Joensen) fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**
*Broyting til § 13:*

| **Viðmerkingar til § 13.2** | **Anmærkninger til § 13.2** |
|---|---|
| Herav skulu 5 mió. kr. brúkast til part av teim 15%, sum ríkið ikki rindar. | Heraf skal 5 mill. kr. anvendes til del af de 15%, som riget ikke betaler. |

*Broyting til § 41:*
Nýtt punkt

3. Viðv. havnaætlan 1978/84:
   Part av teim 15%, ið ríkið
   ikki rindar ..... kr. 6.000.000
   Vedr. havneplan 1978/84: kr. 58.000.000
   Del af de 15%, som riget
   ikke betaler

Atli P. Dam, Erlendur Patursson, Adolf Hansen og Jákup Lindenskov løgdu 25. mars fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

§ 22 - 253808:
Studningur til politiska upplýsing:
Kr. 800.000,- verður broytt til kr. 940.000,-

25. mars løgdu Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til § 13**

§ 13.9 Sekunder berghol
verður lækkað úr kr. 5.000.000
til kr. 4.000.000
við kr. 1.000.000
til hækking av

§13.1 Nýggir vegir og brýr

úr kr. 59.500.000
til kr. 60.500.000

at nýta til grótkast í Haraldssundi.

---

2. viðgerð 25. mars 1983:

§1 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum.
Broytingaruppskot frá minniluta (Atli Dam) fall við 7-0, broytingaruppskot frá minniluta (Ove Mikkelsen) fall við 9-0.

§2 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 27-1 atkvøðum.
Broytingaruppskot frá minniluta (Atli Dam) fall við 9-0 atkvøðum.

§3 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum.
Broytingaruppskot frá minniluta (Atli Dam) fall við 7-0 atkvøðum.

§§4 og 5 í uppskoti landsstýrisins samtyktar við ávikavist 28-0 og 25-0 atkvøðum.

§6 Broytingaruppskot frá meiriluta í fíggjarnevndini samtykt við 17-7, greinin soleiðis broytt samtykt við 19-0. Broytingaruppskot frá minniluta (A. Dam) fall við 11-0.

§7 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 19-0, broytingaruppskot frá minniluta (A. Dam) fall við 7-0.

§8 samtykt við 23-0 atkvøðum.

§10 samtykt við 27-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minnilutunum í fíggjarnevndini Ove Mikkelsen og Atli Dam fullu ávikavist við 12-0 og 11-0.

§11 Broytingaruppskot frá meirilutanum í fíggjarnevndini samtykt við 17-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 21-0. Broytingaruppskot frá minnilutunum Adolf Hansen, Ove Mikkelsen og Atli Dam fullu ávikavist við 2-0, 6-0 og 7-0 atkvøðum.

Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen til konto nr. 11410 fall við 11-0.

§12 Broytingaruppskot frá meiriluta í fíggjarnevndini samtykt við 17-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 27-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen fall við 2-0, broytingaruppskot frá minnilutanum Ove Mikkelsen til konto 12202 og 12508 fullu við 7-0.

§13 Broytingaruppskot frá meiriluta í fíggjarnevnd samtykt við 20-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 24-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen fall við 2-0, frá Ova Mikkelsen og Atla Dam bæði við 11-0.

§14 broytingaruppskot frá meiriluta í fíggjarnevnd samtykt við 22-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 25-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen Vinnuskúli í Eysturoy fall við 4-0, studn. til ÍSF fall við 2-0 og restin av uppsk. fall við 2-0. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen fall við 14-0, broytingaruppskot frá Atla Dam: miðstøð fyri undirvísingaramboð fall við 12-0, studn. til ÍSF við 11-0.

§15 broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd samtykt við 23-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 27-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen fall við 2-0. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen 1551 fall við 7-0, 323086 fall við 13-0, 323116 fall við 12-0, 323157 fall við 12-0, 323181 fall við 15-0, 323150 fall við 13-0. Broytingaruppskot frá Atla Dam fall við 14-0.

§16 broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd samtykt við 20-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 29-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen fall við 2-1, broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen 16018-16208 fall við 10-0, 16209 við 13-0, 333017 við 2-0, 333017 við 13-0. Broytingaruppskot frá Atla Dam 16018 fall við 13-0, 333017 við 10-0, 383082 við 12-0, 16403 við 14-0.

§17 Broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd samtykt við 19-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 20-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen fall við 2-0, frá Ova Mikkelsen fall við 12-0 og frá Atla Dam við 11-0.

§18 Broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd samtykt við 21-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 26-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen 18235 fall við 13-0, 18268 við 6-0, restin av greinini fall við 2-0. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen 18109 fall við 14-0, 18235 fall við 15-0, 18343 við 13-0, 353019 við 8-0. Broytingaruppskot frá Atla Dam 18109 fall við 12-0, 18323-353083-353018 fall við 7-0.

§19 Broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd samtykt við 20-0

greinin soleiðis broytt samtykt við 23-0. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen 363636 fall við 9-0. 363644 fall við 7-0, 363707 fall við 9-0, Arbeiðsloysisgrunnur fiski- og útróðrarmanna við 14-0, restin av greinini fall við 2-0. Broytingaruppskot frá minniluta. Ova Mikkelsen 19607-19208 fall við 12-0, 19664 fall við 15-0, 363669 fall við 15-0, 363777 fall við 11-0. Broytingaruppskot frá minnil. Atla Dam 19607-363669 fall við 10-0, 363767 fall við 14-0, 363715 fall við 10-0.

§§ 20-26 samtyktar við 24-0 atkvøðum.

§§ 30-40 samtyktar við 25-0 atkvøðum.

§ 41 broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd samtykt við 22-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 20-0.

§§ 42-46 samtyktar við 26-0.

Málið soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð við 29-0.

Uppskot til samtyktar frá minniluta Ova Mikkelsen I fall við 15-0, uppskot 2 »At Posthúsið skal standa seg«, samtykt við 22-0, uppskot 3 fall við 15-0, uppskot 4 við 7-0, uppskot 5 fall við 7-0, uppskot 6 fall við 14-0, uppskot 7 fall við 11-0, uppskot 8 fall við 7-0.

3. viðgerð sama dag á seinni fundi:

Atli Dam v.fl. løgdu fram broytingaruppskot til § 22.

Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen løgdu fram broytingaruppskot til § 13.

Broytingaruppskotið til § 22 varð samtykt við 23-1 og til § 13 varð samtykt við 17-1.

Málið soleiðis broytt og sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 400-34. Lóg nr. 27 frá 28. mars 1983.

# 45. Býti av útreiðslunum til heimasjúkrasystra-, heilsusjúkrasystra- og skúlalæknaskipan

Ár 1982, mánadagin 13. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um býti av útreiðslunum til heimasjúkrasystra-, heilsusjúkrasystra- og skúlalæknaskipan.**

§1. Av Føroya parti av útreiðslunum sbrt. kgl. fyriskipanir um heimasjúkrasystra-, heilsusjúkrasystra- og skúlalæknaskipan ber landskassin útreiðslurnar til lønir o.t. og herumframt umsiting, meðan kommununurnar útvega og bera útreiðslurnar til høli v.m.

§2. Henda lóg fær gildi fyri útreiðslur, ið verða rindaðar fyri tíðina aftaná, at kgl. fyriskipanirnar fingu gildi 1. februar 1981.

**lagtingslov om fordeling af udgifterne til hjemmesygeplejerske-, sundhedsplejerske- og skolelægeordning.**

§1. Af Færøernes andel af udgifterne ifølge kgl. anordninger om hjemmesygeplejerske-, sundhedsplejerske- og skolelægeordning udreder landskassen udgifterne til løn o.l. samt administration, medens kommunerne tilvejebringer og udreder udgifterne til lokaler m.v.

§2. Denne lov får virkning for udgifter, der afholdes for tiden efter de kgl. anordningers ikrafttræden den 1. februar 1981.

**Viðmerkingar:**
Í løgtingsmáli nr. 27/1979: Kgl. fyriskipanir um »hjemmesygeplejerskeordninger, sundhedsplejerskeordninger og skolelægeordning« samtykti løgtingið 4. mars 1980, at tær umrøddu tríggjar kgl. fyriskipanirnar skuldu setast í gildi í Føroyum, og tær fingu gildi 1. februar 1981.

Sambært fyriskipanunum rindar landskassin útreiðslurnar av skipanunum, men ríkiskassin endurrindar landskassanum 50% av útreiðslunum, tó ikki av útreiðslunum til umsiting av skipanini, meðan restin verður býtt eftir reglum, sum heimastýrið ásetir.

Í frammanfyri umrødda løgtingsmáli nr. 27/1979 var roknað við, at tær útreiðslur, sum ríkiskassin ikki endurrindar landskassanum, skuldu býtast í heivt milium landskassan og kommunurnar, men har var bert talan um útreiðslur til sjálvar skipanirnar til løn o.t., ikki útreiðslur til høli v.m.

Landsstýrið er av teirri áskoðan, at tað mest rímiliga býtið millum landskassan og kommunurnar av teimum útreiðslunum til skipanirnar, sum skulu rindast frá føroyskari síðu, fæst, um landskassin einsamallur ber útreiðslurnar til lønir o.t. og hierumframt umsiting, og kommunurnar útvega og bera útreiðslurnar til høli v.m. við møguleika at útvega studning og lán úr heilsumiðstøðargrunninum til bygging av hølum, tó so at høli til skúlalæknaskipanina eins og higartil verða útvegað og fíggjað eftir reglunum um fóikaskúla bygging.

Í fíggjarárinum 1983/84 verða skipanirnar ætlandi fult útbygdar, og sambært uppgerð frá ríkisumboðsmanninum verða samlaðu útreiðslur landskassans til skipanirnar eftir frammanfyri tilskilaða býti 3.027.000 kr. og herumframt til umsiting 317.000 kr., ella tilsamans 3.344.000 kr.

1. viðgerð 15. december 1982. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 17. december. Uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 28-0, §2 samtykt við 29-0, at fara til 3. viðgerð samtykt við 29-0.

3. viðgerð á seinri fundi sama dag. Málið sum samtykt við aðru viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 908-6

Lóg nr. 3 frá 6. jan. 1983

# 46. Løgtingsmál um, at heimastýrið tekur sær av avgreiðsluni hjá Føroya Kirkjueftirliti

Ár 1982, mikudagin 15. december legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at broyta lógina um stjórn kirkjunnar, soleiðis at ríkisumboðsmaðurin — í lógini undir §2 nevndur amtmaður — fer úr nevndini, samstundis sum avgreiðslan hjá kirkjueftirlitinum verður flutt frá ríkisumboðsskrivstovuni til Føroya Landsstýri. Hendan skipan skal galda frá 1. apríl 1983.

**Viðmerkingar:**

Føroyska fólkakirkjan er felagsmál. Tjóðveldisflokkurin hevur mangan og scinast undir tingingunum um landsstýrissamgonguna 1978 til fánýtis roynt at fáa yvirtikið fólkakirkjuna.

Tá hetta ikki kann fremjast, tá flokkurin er í samgongu, má tað metast ógjørligt at yvirtaka fólkakirkjuna, meðan flokkurin er í andstøðu.

Hin vegin verður tað hildið sjálvsagt, at vit sjálv umsita mál, sum altíð hava hoyrt undir Føroya Løgting.

Hugsað verður um fyrisitingina av kirkjum og kirkjugørðum, sum er løgd undir heimastýrið. Løgtingið stjórnar Føroya kirkjugrunni, ið nýtir fæ sítt til umsiting av kirkjunum uttan, umbygging av verandi og bygging av nýggjum kirkjum. Herumframt letur grunnurin studning

til girðing av kirkjugørðum og til útvegan av føroyskt bygdum urgum. Kirkjugrunnurin fær fæ sítt játtað á teimum árligu fíggjarlógunum. Sambært lóg nr. 109 frá 29. mars 1924 um »Kirkernes styrelse m.v.« hevur kirkjueftirlit Føroya dagliga eftirlitið við kirkjunum. Har sita ríkisumboðsmaðurin, ið er formaður, varabiskuppurin og 3 limir, valdir av løgtinginum. Kirkjueftirlitið gevur løgtinginum tilmæli um nýtslu av fæ grunsins. Skrivstova ríkisumboðsins virkar sum avgreiðsluskrivstova.

Omanfyri nevnda lóg, ið er yvir hálvthundrað ára gomul, sigur í seinastu grein, at 3 ár aftan á at lógin er farin at virka, skal hon endurskoðast. Hendan endurskoðanin er ongantíð farin fram, og man tað helst vera orsøkin til, at ríkisumboðsmaðurin alsamt situr í hesi nevnd og eisini sum formaður, hóast lógin hvørki tilskilar hetta, ella at umsitingin skal vera á skrivstovu ríkisumboðsins.

Hetta má sigast at vera sera øvugt og mannminkandi fyri okkum og er eitt óneyðugt millumlið millum føroyska kirkjufólkið og Guds hús. Mælt verður tí til, at kirkjueftirlitið verður flutt frá ríkisumboðsskrivstovuni til landsstýrið, eins og løgtingið ella landsstýrið velur annað fólk í nevndina fyri ríkisumboðsmannin.

Valla er neyðugt at leggja aftrat, at løgtingsnevndin, ið viðger málið, sjálvsagt syrgir fyri, at orðaljóðið í hesi lóg verður føroyskt. Broytingin í hesum máli kann neyvan kosta meiri enn tað, frímerki og pappír kosta, og tað kann valla koma upp á tal at seta serligt fólk at umsita hetta mál.

Annars verður víst til kap. 9 í ársfrágreiðingini fyri Føroyar um fólkakirkjuna.

Um løgtingsnevndin, ið viðger hetta mál, annars skuldi verið sinnað at arbeitt við spurninginum um yvirtøku av fólkakirkjuni í Føroyum, so er tjóðveldisflokkurin til reiðar.

---

1. viðgerð 16. december 1982. Málið varð beint í lóganevndina, sum 17. februar 1983 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Karini Kjølbro tann 15. december 1982 og við 1. viðgerð tann 16. í s.m. beint í lóganevndina.

Í uppskotinum verður mælt til at broyta lógina um stjórn kirkjunnar soleiðis, at ríkisumboðsmaðurin fer úr nevndini, samstundis

sum avgreiðslan hjá kirkjustjórnini verður flutt frá ríkisumboðsskrivstovuni til Føroya landsstýri.

Kirkjumál eru felagsmál, og kann lógin um stjórn kirkjunnar sostatt bert broytast við ríkislóg. Eftir galdandi lóg er tó einki til hindurs fyri, at samráðst verður fyri at flyta umsitingina til Føroya landsstýri.

Viðvíkjandi arbeiðnum av at umsita kirkjueftirlitið hevur nevndin fingið upplýst, at stjórnin hevur tveir fundir árliga, umframt at stjórnin tvær ella tríggjar ferðir árliga ger rundferð at sýna kirkjur. Kirkjustjórnin reviderar og deciderar roknskapirnar hjá kirkjunum, tilsamans 57, og verður arbeiðið av hvørjum roknskapi mett at taka umleið ein tíma. Haraftrat kemur arbeiði av at fyrireika mái til fundirnar og at avgreiða viðgjørd mál. Hvussu stóran part av arbeiðinum hjá einum fólki hetta tekur, hevur ríkisumboðsskrivstovan ikki gjørt sær nakra meting um.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Edmund í Garði, Agnar Nielsen og Jona Henriksen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Petur Reinert) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá Tjóðveldisflokkinum.

2. viðgerð 2. mars. Atkvøðugreiðslan 4. mars. Uppskotið til samtyktar fall við 9-0 atkvøðum.

# 47. Almenn størv til brekað

Ár 1982, mikudagin 15. december legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

I. Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera tað so í bandi, at á øllum arbeiðsplássum undir landinum, herundir stovnar, ið verða fíggjaðir av ríkiskassa og landskassa, skulu nøkur størv altíð vera sett við heilsuliga brekaðum fólki.

II. Henda løgtingssamtykt verður, tá reglugerðin er gjørd, lýst í øllum føroyskum bløðum, eins og hon verður send øllum stovnsleiðarunum í seinasta lagi 1. apríl 1983.

**Viðmerkingar:**
Í mong ár hava vit bíðað eftir eini støðu hjá tí almenna, kommunum, løgtingi og landsstýri, til tey brekaðu og gerandisdag teirra. Hugsað verður m.a. um møguleikarnar at klára seg á vegnum og í ferðsluni, møguleikarnar at koma inn og út í almennum bygningum eins og møguleikarnar fyri at fáa ein sjálvstøðugan bústað.

Spurningurin um endurbúgving og ávising av arbeiði til brekað var tikin upp í 1977, við at ein stórur arbeiðsbólkur varð settur at gera álit um framtíðar endurbúgving í Føroyum. Til vars eru 5 ár liðin, síðan hetta álit var handað landsstýrinum, men alsamt er støða teirra brekaðu óbroytt.

Um so er, at hetta mál um endurbúgving er við at koma undir land, so er tað í tøkum tíma, men harfyri er hetta uppskotið als ikki óneyðugt. Spurningurin um arbeiði til brekað hevur altíð verið trupul, men

okkurt bendir á, at støðan er munandi versnað seinastu árini, tí tað sum heild er ilt at útvega arbeiði til allar vinnuførar hendur.

Eins og tað er støða Tjóðveldisfloksins, at allir føroyingar eiga okkara land, so er tað sannføring floksins, at øll í hesum landi skulu hava møguleikan at lívbjarga sær og sínum, soleiðis sum víst var á í uppskoti floksins hin 19. januar 1971 um skráseting av heilsuveikum og brekaðum fólki og kannan av arbeiðslíkindum teirra.

Av tí at tað er royndur lutur, at fatanin hjá stovnsleiðarum í summum førum er meiri negativ enn positiv — undantøk eru kortini — so eru hyggjuráðini helst at skipa fyri skeiðum fyri teimum, ið seta fólk í starv til tess at elva til størri góðsemi fyri hesum spurningi og til tess at ásanna, at slíkt tiltak saman við mongum øðrum, ið bera á sama borð, er neyðugt.

Tá vit hava fingið hesa skipan at rigga á almennum arbeiðsplássum, er vónandi vilji til at umhugsa somu tiltøk á privata arbeiðsmarknaðinum. Til tess at fyribyrgja illvilja móti hesum uppskoti skal dentur leggjast á, at ætlanin sjálvsagt er, at tey brekaðu so vítt gjørligt gerast kappingarfør við tey sokallaðu normalu.

1. viðgerð 16. december 1982. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 23. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram á ting av Tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 16. december 1982 beint í sosialu nevndina.

Málið snýr seg um at áleggja landsstýrinum at skipa fyri, at nøkur størv hjá tí almenna altíð skulu verða sett við heilsuliga brekaðum fólki.

Undir viðgerðini í nevndini hevur tað víst seg, at breið semja var um, at hesin spurningur skuldi hava eina loysn. Allir politiskir flokkar hava eisini áður boðað frá góðum vilja til at útvega heilsuliga brekaðum størv, sum tey eftir teirra umstøðum hava møguleika fyri at røkja.

Tíðin sær eisini út til at vera komin til at fáa eina skipaða loysn á hesum øki í sambandi við, at endurbúgvingarstovnurin nú verður veruleiki sum alment virkandi stovnur.

Í staðin fyri uppskot Tjóðveldisfloksins setir tí ein samd nevnd fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at á øllum arbeiðsplássum undir landinum, herundir stovnum, ið verða fíggjaðir av landskassa og ríkiskassa í felag, skulu nøkur størv altíð kunna verða sett við heilsuliga brekaðum fólki.

Landsstýrið ger reglugerð hesum viðvíkjandi. Reglugerðin verður løgd fyri sosialu nevnd løgtingsins til góðkenningar.

2. viðgerð 24. mars. Atkvøðugreiðslan á seinri fundi sama dag. Uppskot til samtyktar frá samdari nevnd í staðin fyri upprunauppskotið samtykt við 31-0 atkvøðum.

---

# 48. Innflutningsloyvi til ísfiska-trolara til P/f Kleivin, Sandi

Ár 1982, mikudagin 15. december løgdu tingmenninir Tórálvur Mohr Olsen og Hans M. Joensen fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at geva P/f »Kleivin« á Sandi innflutningsloyvi til ísfiskatrolara, ið felagið ætlar at keypa.

**Viðmerkingar:**
P/f Kleivin, Sandi, hevur fyri fleiri mánaðum síðani søkt Føroya Landsstýri um innflutningsloyvi til ávísan trolara, eftir at menn hava mett tað hava alstóran týdning fyri tað nýggja flakavirkið á Sandi, P/f Borgin, sum nú stendur liðugt, at ein bátur av hesi støddini kemur til bygdina, tí sum er, er rávørugrundarlagið við teimum har til økið hoyrandi bátum ov lítið.

Trolarin, sum talan er um, er nevndur »Louise J« úr Skotlandi, bygdur 1979, men hevur ikki verið til fiskiskap meir enn 1/2 ár og hevur nú ligið 1 1/2 ár við bryggju. Støddin á bátinum er 29,90 m langur, 8,40 m breiður, og hann metist at kunna lasta 95 tons av ísfiski. Maskinkraftin er 910 hk Blackstone.

Báturin stendur keyparunum í boði fyri 420.000 £ ella í dag umleið 5.800.000 kr.

Eftir at felagið í mánaðir hevur bíðað eftir svari frá Føroya Landsstýri, so er nú komið boð frá Føroya Landsstýri um, at umsóknin kann ikki verða gingin á møti.

Felagið heldur seg ikki kunna góðtaka hesa støðu hjá Landsstýrinum, tí ein dag og dagliga hoyrir, at landsstýrið gevur loyvi til bygging av nýggjum skipum bæði her heima og í útlondum. Felagið metir, at hesin trolarin er nýggjur, og somu áskoðan hava fíggjanarmyndugleikarnir, har Realkreditstovnurin hevur játtað fíggjan sum til nýtt skip.

Av tí at landsstýrið førir tann politikk at geva loyvi til nýggj skip at verða bygd og innflutt, so átti landsstýrið samstundis at fylgt við, hvussu býtið av hesum skipum fer fram millum tey ymisku økini í Føroyum. Uppskotsstillararnir halda, at um loyvið verður givið til innflutning av hesum skipi, so var hetta eitt stig á ta leið, sum eitur bygdamenning.

Uppskotsstillararnir halda, at av frammanfyri standandi viðmerkingum framgongur, at vit halda avgerðina hjá Føroya Landsstýri vera skeiva, og loyva vit okkum tí at biðja Føroya Løgting um at taka støðu í málinum.

1. viðgerð 16. december 1982. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 17. december. Uppskotið fall, atkvøtt varð við navnakalli, har 14 atkvøddu ja, 17 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Viihelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Heini Olsen, Fredrik Olsen, Adolf Hansen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Dánjal P. Dalbø, Eli Nolsøe, Dánjal Larsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddur: Edmund í Garði.

# 49. Grannskoðan av almennum roknskapum

1. Sjúkrahúsini
2. Postverk Føroya
3. Menningargrunnur Ídnaðarins v.m.
4. Tjaldurs Apotek
5. »Nónhamar«

Ár 1982, fríggjadagin 17. december løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Álit**

**Løgtingsmál nr. 49-1/1982:**
**Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi roknskapir hjá Sjúkrahúsverki Føroya fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá

Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá sjúkrahúsunum eru kannað.

Løgtingsgrannskoðararnir eru varir við, at eykafíggjarlógin hjá sjúkrahúsunum, sum vanliga verður løgd fram rættiliga tíðliga í hvørjum fíggjarári sær, verður ikki løgd fyri fíggjarnevnd Løgtingsins til góðkenningar ella játtanar.

Um hesi viðurskifti hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt kanningar og fyrispurningar hjá umsjónarmanninum, roknskapargrannskoðaranum og sjúkrahússtjóranum, sum sigur: Fíggjarlógaruppskotini hjá sjúkrahúsunum vórðu til og við 1979/80 send fíggjarnevnd Løgtingsins beinleiðis. Í januar mánaði 1980 hevur Føroya Landsstýri broytt hesa mannagongd soleiðis, at uppskotini skuldu fyrst sendast landsstýrinum, sum síðani skuldi leggja tey fyri fíggjarnevndina.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at hetta verður fingið í rætt lag, soleiðis at tað er fíggjarnevnd Løgtingsins, sum í fíggjarárinum tekur støðu til møguligar eykaútreiðslur ella meirjáttan, og ikki eitt løgting mánaðir aftaná, at eitt fíggjarár er farið aftur um bak, á eini eykafíggjarlóg.

Viðvíkjandi Suðuroyar Sjúkrahúsi er annars at siga, at ein orðing í frágreiðing frá stovninum um, at meirnýtsla stavar frá eini ov lítlari játtan, ikki kann góðtakast sum grund fyri, at ein konto er yvirtrekt.

Um kostarhald á sjúkrahúsinum er at siga, at hetta er toluliga javnt frá sjúkrahúsi til sjúkrahús; løgtingsgrannskoðararnir meta tí, at henda síðan av sjúkrahúsrakstrinum er í lagi.

Annars gera løgtingsgrannskoðararnir vart við, at orsakað av tí lága innleggingarprosentinum er raksturin av Suðuroyar Sjúkrahúsi pr. sjúkradag ov dýrur.

Í 1976/77 var innleggingarprosentið 59, í 1977/78 var tað 64,7, í 1978/79 var innleggingarprosentið upp (móti tí á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum, í 1979/80 fall tað aftur niður á 83,6, og í 1980/81 var tað komið niður á 75,6.

Av hesum lága innleggingarprosenti hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi kemur dagligi kostnaðurin pr. sjúkradag at vera ov høgur í mun til samlaðu útreiðslurnar hjá sjúkrahúsinum.

Í 1980/81 javnvigar roknskapurin hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi við 10,251 mill. kr. Dagligi kostnaðurin pr. sjúkradag verður ca. kr. 1.428,00.

Í 1980/81 javnvigar roknskapurin hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi við 19,560 mill. kr. Dagligi kostnaðurin pr. sjúkradag verður kr. 1.015.00.

Roknskapurin hjá Landssjúkrahúsinum javnvigar sama árið við

94,869 mill. kr. Sjúkradagskostnaðurin hjá Landssjúkrahúsinum verður kr. 967,00.

Landsstýrið verður gjørt vart við, at innleggingarprosentið á Suðuroyar Sjúkrahúsi er ov lágt, og sjúkrahúsið tí er ov dýrt í rakstri, og at ein loysn má fáast á hesum spurningi.

Viðvíkjandi Klaksvíkar Sjúkrahúsi gjørdu løgtingsgrannskoðararnir vart við, at tey í frágreiðingini fyri 1979/80 nevndu nýggju læknahús, tryggingarvirði 700.000 kr., ikki vóru í nóg góðum standi, og at húsini máttu umvælast, so tey kundu verða í nýtslu.

Eisini gjørdu løgtingsgrannskoðararnir vart við, at tvey av húsunum, sum sjúkrahúsið eigur, eru ov lágt tryggjað, og má hetta ajourførast.

Viðvíkjandi lønútreiðslunum hjá øllum sjúkrahúsunum, sum eru ca. 70-75% av samlaðu útreiðslum sjúkrahúsanna, eru løgtingsgrannskoðararnir varir við, at roknskapargrannskoðarin einki nevnir um, at hesin útreiðslupostur verður kannaður. Fyri at løgtingsgrannskoðararnir kunnu hava trygd fyri, at lønirnar eru kannaðar, vil nevndin hava, at roknskapargrannskoðarin nevnir hetta í frágreiðing síni.

Sjúkrahúsini føra ongan ognarroknskap. Ognirnar hjá sjúkrahúsunum verða bert skrásettar aftast í rakstrarroknskapinum, sundurgreinaðar við brunatryggingarvirðinum. Í roknskapinum hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi er tó avrit av tryggingarskjølunum í staðin fyri skráseting. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at avrit av tryggingarskjølunum eisini verða við í roknskapunum hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum.

Í 1977 hevur Føroya landsstýri ókeypis fingið tilskeytað allar ognirnar hjá Statshospitalinum. Sostatt stendur Færøernes hjemmestyre, Føroya landsstýri, sum eigari av hesum ognum.

Løgtingsgrannskoðararnir átala annars, at nýtslan hjá øllum sjúkrahúsunum er ov stór, og at neyvari má verða mett, tá fíggjarlógaruppskotini verða gjørd.

Annars verða frammanfyri nevndu roknskapir hjá Sjúkrahúsverki Føroya tiknir til eftirtektar.

**Løgtingsmál nr. 49-2/1982:**

**Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Postverki Føroya fyri fíggjarárini 1978/79, 1979/80 og 1980/81 saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Postverki Føroya fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá postverkinum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapur og fíggjarliga støða Postverksins eru í lagi.

Viðvíkjandi roknskapinum hjá postverkinum fyri 1978/79 hava løgtingsgrannskoðararnir eftir áheitan fingið skriv dagfest 8/5-1980 frá grannskoðara postverksins, har sagt verður frá, at revisiónin av nevnda roknskapi er liðug, men fyri at kunna stilla roknskapin upp hevur grannskoðarin síðan november 1979 bíðað eftir avgerð frá landsstýrinum viðvíkjandi játtan á fíggjarlógini til byggi- og rakstrargrunn postverksins, sum ikki er útgoldin.

Á fundi, sum roknskapargrannskoðarin hevði við eksterna grannskoðara landsins tann 16/4-1980, varð semja um at heita á landsstýrið um at fáa greiðu á hesum máli skjótast, og mæla til, at nevndi grunnur, ið liggur sum partur av landskassans likviditeti, verður bókaður sum innistandandi í landskassanum og í millumrokning við Postverk Føroya. Í roknskapinum hjá Postverkinum verður upphæddin ført sum aktiv undir heitinum tilgóða hjá landsstýrinum.

Í skrivinum verður eisini mælt landsstýrinum til, at yvirtiknar ognir og bygningar frá Post- og Telegrafverkinum, tilsamans kr. 1.925.571,00, og tilskot frá P.&T., kr. 1.200.000,00, ialt kr. 3.125.571,00 verður tikið við í rakstrargrunn postverksins.

Viðvíkjandi nevndu viðurskiftum millum Føroya Landsstýri og Postverkið hava løgtingsgrannskoðararnir fingið váttan fyri, at tey nú eru í lagi, og at millumrokningin millum postverkið og landskassan stemmar.

Løgtingsgrannskoðararnir eru sostatt varugir við, at roknskapar-

grannskoðarin hevur bíðað eitt hálvt ár ella meir fyri at kunna gera roknskapin lidnan, tí landsstýrið ikki hevur fingið avgreitt hetta mál til tíðina.

Viðvíkjandi millumrokning við Strandfaraskip Landsins og Postverkið framkemur ein munur fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 uppá ialt kr. 1.405.692,61, sum Strandferðslan krevur meir fyri postflutning, enn postverkið vil gjalda.

Upphæddin er ikki við í roknskapinum.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at landsstýrið í stundini fær greitt henda spurning, av tí at upphæddin er alt ov stór til at hanga í leysari luft hjá báðum stovnum, og at hetta í privatum vinnulívi fyri langari tíð síðan hevði fingið rætsligar fylgjur, og at tað tí er heilt náttúrligt, at tað almenna fær loyst spurningin líka skjótt, sum slíkt verður kravt av privatum.

Viðvíkjandi kassamanco á einum posthúsi hava løgtingsgrannskoðararnir fingið váttan herfyri, at komið er til botns í hesum máli, og at trygd er fingin fyri, at Postverkið klárar at fyribyrgja slíkum hendingum frameftir við eini neyvari samskipan millum ta internu grannskoðanina av posthúsinum og Postverksins egnu grannskoðarar.

Í frágreiðingini fyri 1980/81 ger roknskapargrannskoðarin vart við, at nettoavlopið hjá frímerkjadeildini er minkað við kr. 13.653.000,00 úr 23.323.000,00 niður í kr. 9.760.000,00 svarandi til 58%.

Ein av orsøkunum til, at inntøkan er so nógv minkað, kemst av, at útreiðslurnar til prenting av Europamerkjunum blivu so stórar, fyrst og fremst tí feilur var í útgávuni, soleiðis at henda útgáva mátti prentast 2 ferðir, og kravdi hetta nógvar eykaútreiðslur.

Løgtingsgrannskoðararnir heita á Løgtingið at áleggja landsstýrinum at bera so í bandi, at ikki má farast undir so kostnaðarmikið tiltak sum prenting av søluvirði fyri fleiri mill. kr., uttan at Postverkið mótvegis prentsmiðjuni er fult tryggjað móti slíkum peningamissi.

Annars taka løgtingsgrannskoðararnir frammanfyri nevndu roknskapir hjá Postverki Føroya til eftirtektar.

**Løgtingsmál nr. 49-3/1982:**

**Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi roknskapir saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Menningargrunnur Ídnaðarins 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82.
2. Happadrátturin 1975, 1976, 1977, 1978, 1979 og 1980.
3. Mentunnargrunnur Føroya Løgtings 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.
4. Skúlabókagrunnurin 1977/78, 1978/79 og 1979/80.
5. Húsalánsgrunnurin 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

**1. Menningargrunnur Ídnaðarins 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Menningargrunninum fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunninum eru kannað, og at roknskapargrannskoðararnir hava fingið vissu fyri, at roknskapur og tann fíggjarliga støða grunsins er í lagi. Løgtingsgrannskoðararnir hava lagt til merkis, at virksemi grunsins hesi fýra árini er økt rættiliga nógv.

Í 1978/79 vóru samlaðu útlánini 13,250 mill. kr., meðan tey í 1981/82 vóru 41,736 mill. kr.. Í 1978/79 vórðu veittir studningar tils. 1,4 mill. kr., meðan hesir í 1981/82 vóru 2 mill. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir leggja serligan dent á tað, sum roknskapargrannskoðarin øll árini hevur sagt, at ymiskir trupulleikar hava verið við roknskaparviðurskiftum grunsins. Løgtingsgrann-

skoðararnir taka undir við, at grannskoðarin hevur roynt at fingið hesi viðurskifti grunsins í rætt lag.

Hetta er ein almennur grunnur, og eiga eins stór krøv at verða sett til hansara og til aðrar fyritøkur og stovnar í landinum.

Roknskapargrannskoðarin hevur tó váttað fyri nevndini, at roknskapurin ikki gevur grund fyri ampa um peningaviðurskifti grunsins. Løgtingsgrannskoðararnir skiltu, at nú hevur Menningargrunnurin fingið fastan bókhaldara burturav, og nevndin vónar og væntar, at hetta fer at fáa dagliga roknskapararbeiðið í eina rætta legu, soleiðis at vit ikki síggja ta viðmerking grannskoðarans, at bókhaldið ikki er heilt í lagi.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast annars um, at Menningargrunnurin hevur arbeitt rættiliga effektivt, soleiðis at umsóknir hava verið viðgjørdar so mikið skjótt, at tær flestu eru avgreiddar innan 30 dagar.

Annars hava løgtingsgrannskoðararnir ongar viðmerkingar at gera í sambandi við gjøgnumgongdina av hesum roknskapum.

## 2. Happadráttur in 1975, 1976, 1977, 1978, 1979 og 1980

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá føroyska Happadráttinum fyri omanfyri nevndu ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá Happadráttinum eru kannað.

Løgtingsgrannskoðararnir hava ongar viðmerkingar til sjálvar roknskapirnar hjá Happadráttinum. Kortini umrøddi nevndin aðrar møguleikar fyri nýtslu av avlopinum frá Happadráttinum enn verandi, nú avlopið verður latið landskassanum. Í staðin mæla løgtingsgrannskoðararnir landsstýrinum til at taka til umhugsanar og viðgerðar, um avlopið kann brúkast til eitthvørt nyttugt ella vælgerandi endamál.

## 3. Mentunargrunnur Føroya Løgtings 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Mentunargrunninum fyri fíggjarárini 1977/78 til og við 1980/81 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunninum eru kannað.

Løgtingsgrannskoðararnir meina, at tann parturin av stovnsfæi grunsins, sum stendur í útlendskum peningastovnum, ca. 700.000 kr. av einum samlaðum stovnsfæi uppá ca. 800.000 kr., í staðin verður settur í føroyskar peningastovnar at renta.

Roknskapirnir verða annars tiknir til eftirtektar.

## 4. Skúlabókagrunnurin 1977/78, 1978/79 og 1979/80

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Skúlabókagrunninum fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunninum eru í lagi.

Vit hava gjøgnumgingið tilfarið og eisini listan yvir bókaútgávu og bókagoymslu.

Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at grunnurin ger eitt umfatandi arbeiði fyri ta játtan, sum hann fær á fíggjarlógini. Grunnurin megnar at fáa millum 20 og 25 bøkur út fyri játtanina uppá 600.000 kr., sum hann fær árliga.

Annars hava løgtingsgrannskoðararnir ongar viðmerkingar.

## 5. Húsalánsgrunnurin 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Húsalánsgrunninum fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunninum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapur og tann fíggjarliga støða grunnsins eru í lagi.

Í frágreiðingunum til roknskapirnar 1978/79, 1979/80 og 1980/81 hevur roknskapargrannskoðarin viðmerking um, at bókhaldari, kassameistari og stjóri er sami persónur, og at ynskiligt hevði verið, at hesi størv ikki vóru røkt av sama persóni.

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað hetta bæði við fyrispurningum til grunnin og roknskapargrannskoðaran og fingið váttan fyri, at hesi viðurskifti nú eru í lagi og tikið til eftirtektar, at man nú hevur fingið tveir ymiskar persónar at røkja hesi bæði størvini, so at tey ikki eru sámanfallandi.

Grannskoðararnir tosaðu annars um spurningin viðvíkjandi metingarmonnum grunnsins, aftaná at hesin hevur átikið sær meting av nýggjum húsum og umvæling av gomlum húsum, eitt

arbeiði, sum Føroya Sparikassi hevði áður, men sum Húsalánsgrunnurin nú hevur átikið sær at gera. Spurningurin er ti, um Føroya landsstýri eigur at taka til umhugsunar, hvussu vítt man skal brúka hesa skipanina, ella man eigur at fáa metingarmenn á teimum ymisku støðunum.

Hetta er væl ein spurningur um kostnað, og kundi landsstýrið tikið henda spurning til umrøðu við Húsalánsgrunnin.

Í revisiónsfrágreiðingini 1979/80, sundurgreinan til rakstrarútreiðslur tils. kr. 811.417,63, er kontoin »aðrar útreiðslur« uppá kr. 112.994,84. Løgtingsgrannskoðararnir ynsktu at fáa hesa upphædd útgreinaða.

Orsøkin til, at posturin »aðrar útreiðslur« fyri 1979/80 var so stórur, komst av, at Húsalánsgrunnurin flutti í nýggj høli hetta ár og hevði rættiliga stórar umvælingar.

Løgtingsgrannskoðararnir átala annars, at kontoirnar ymsar útreiðslur ofta eru stórar og ikki útgreinaðar, og at tað ikki framgongur, hvat útreiðslan snýr seg um.

Viðvíkjandi virðisbrøvum grunnsins eru løgtingsgrannskoðararnir samdir um, at man eigur at brúka føroyskar peningastovnar í størst møguligan mun. Av tí at hetta er føroyskur peningur, sum vit sjálvir standa sum lænarar av, er tað heilt náttúrligt, at hesin peningur verður havdur inni á føroyskum peningastovnum.

---

**Løgtingsmál nr. 49-4/1982:**

**Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi roknskap hjá Tjaldurs Apoteki fyri fíggjarárið 1981/82 saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin hjá Tjaldurs Apoteki fyri fíggjarárið 1981/82 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá apotekinum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapur og tann fíggjarliga støða apoteksins eru í lagi.

Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at myndin fyri 1981/82-roknskapin er broytt frá einum samlaðum halli í 1980/81 uppá kr. 155.984,53 til eitt rakstraravlop uppá kr. 368.736,66, harav apotekið í Tórshavn hevði eitt avlop uppá kr. 224.826,47, apotekið í Klaksvík eitt avlop uppá kr. 226.956,92, meðan apotekið á Tvøroyri hevði eitt hall uppá kr. 83.046,73.

Sum nevnt í okkara fyrra áliti dagfest 15. mars 1982 viðvíkjandi Tjaldurs Apoteki 1977/78 til og við 1980/81 hava løgtingsgrannskoðararnir aftur bitið merki í, at Klaksvíkar Apotek hevur havt rakstraravlop, meðan apotekið á Tvøroyri hevur havt rakstrarhall. Nevndin hevur kannað orsøkina til hetta og hevur fingið frágreiðing frá apotekinum á Tvøroyri um orsøkina til, at tað hevur hall, meðan apotekið í Klaksvík hevur avlop. Í fyrsta lagi verður sagt, at sølan á Klaksvíkar Apoteki er 226.800 kr. meiri enn á Tvøroyri, sum gevur ein meirvinning uppá 100.800 kr. Annars framleiðir apotekið á Tvøroyri úr rávøru ella úr hálvfabrikata 32% av sínum heilivági, meðan tað í Klaksvík bert framleiðir 19%. Onnur orsøk til, at rakstrarúrslitið hjá Klaksvíkar Apoteki er betri, er, at sjúkrahúsið í Norðoyggjum hevur keypt lutfalsliga nógv meir á Klaksvíkar Apoteki enn á Tvøroyri. Ein triðja orsøk er, at apotekið á Tvøroyri hevur opið longri enn í Klaksvík. Orsøkin er, at nógv fólk bæði á staðnum og av bygd keypa sín heilivág um døgurðaleitið. Í Suðuroy eru fimm handkeypssølur, sum krevja eina vissa fyrisiting, prís- og datomerking, meðan í Norðoyggjum bert ein handkeypssøla er umframt høvuðsdeildina í Klaksvík. Annars er ætlanin at fáa raksturin í Suðuroynni at svara seg komandi ella næstkomandi fíggjarár.

Roknskapargrannskoðararnir ásanna, at tilráðing frá nevndini at flyta bankalánini í sambandi við bygging av nýggja apotekinum yvir á millumrokning við apoteksgrunnin nú er í lagi.

Byggiroknskapurin hjá nýggja apoteki er gjørdur og revideraður, eins og nevndin hevur tilmælt. Hesin vísir ein endaligan kostnað uppá kr. 11.055.550,84. Herav er kostnaðurin fyri hitamiðstøðina kr. 170.000,-.

**Løgtingsmál nr. 49-5/1982:**

**Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi roknskapir hjá M/s »Nónhamar« fyri árini 1980 og 1981 saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá M/s »Nónhamar« fyri omanfyri nevndu ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá hesum skipi eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið røttu mynd av rakstri skipsins og fíggjarstøðu við árslok 1980 og 1981.

Landskassin yvirtók trolaran í 1980, og síðani hevur hann verið umsitin og rikin av P/f J.F. Kjølbro.

Roknskapirnir fyri omanfyri nevndu ár verða tiknir til eftirtektar.

2. viðgerð 2. februar 1983. Roknskapirnir vórðu samtyktir við 27-0 atkvøðum.

**Løgtingsmál nr. 49-6/1982: Jarðargrunnurin**

**Grannskoðan av almennum rokuskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Føroya Jarðargrunni fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82 saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Løgtingsgrannskoðararnir hava í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapunum hjá grunninum gjørt kanningar og havt fyrispurningar hjá roknskapargrannskoðaranum. Serliga leggur nevndin dent á, at roknskaparhátturin verður broyttur. Nevndin hevur frá roknskapargrannskoðaranum fingið váttan fyri, at farið verður undir í næstu framtíð at broyta og um møguligt foreinkla bókhald og roknskap hjá Føroya Jarðargrunni.

Kannað er eisini um kontoirnar »Ymiskar útreiðslur« hjá stovninum, sum vit mettu vóru nokk so stórar. Nevndin hevur fingið útgreinað yvirlit til hesar kontoir. Líkaleiðis varð kannað eftir øðrum tingum, sum blivu við at ganga aftur, sum vit ynsktu at vita meiri nágreiniliga um.

2. viðgerð 23. mars 1983. Uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 25-0 atkvøðum.

**Løgtingsmál nr. 49-7/1982: Telefonverk Føroya Løgtings**

**Grannskoðan av almennum roknskapum**

Ár 1983, mánadagin 14. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82 saman við viðløgdu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:**
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Telefonverkinum fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjaltilfarið hjá stovninum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapur og fíggjarliga støða verksins er rætt uppsett sambært roknskapin.

Telefonverkið hevur verið til viðgerðar á 4 fundum hjá løgtingsgrannskoðarunum. Á fundunum hevur nevndin havt inni til frágreiðing fyrst roknskapargrannskoðara Telefonverksins, Robert Lefevre Sørensen, og síðan Sólbjørn Jacobsen, stjóra, og til seinast Ernst Hansen, bókhaldara. Hetta er gjørt, fyri at løgtingsgrannskoðararnir kunnu fáa eina holla meting av tí gongd, sum hevur verið hjá Telefonverkinum, verandi fíggjarstøðu Telefonverksins og eisini útlitið frameftir, sum eftir øllum at døma ikki er so bjart.

Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapum og frágreiðing Telefonverksins hava løgtingsgrannskoðararnir bæði hjá roknskapargrannskoðaranum og bókhaldara Telefonverksins gjørt serligar kanningar viðvíkjandi:

1. Taxa- og bilútreiðslum Telefonverksins.
2. Interna E.D.V. bókhaldinum, sum ikki samsvarar við høvuðsbókhaldið, munur pr. 31. mars 1980 kr. 245.243,99.
3. Vørugoymsluni.

4. Innistandandi peningi í Den Danske Bank í 1981 ca. 12 mill. kr.
5. Skuldarum.

Til omanfyri nevndu kanningar hava løgtingsgrannskoðararnir fingið hesar frágreiðingar:

*ad 1.* Samlaðu bilútreiðslur Telefonverksins, rakstur + avksriving er ca. 1 mill. kr. árliga. Mett verður, at henda útreiðsla er ov stór. Hon er heldur ikki minkað í sambandi við automatiseringina. Viðvíkjandi hýruvognskoyring sum heild eru løgtingsgrannskoðararnir av teirri áskoðan, at hon er heilt óvanliga stór, tá hugsað verður um, at Telefonverkið annars hevur eitt støðugt vaksandi tal av bilum á vegnum og eina vaksandi útreiðslu til henda post. Hýruvognskoyring mátti verið óneyðug við tí stóra tali av bilum, sum Telefonverkið hevur. Kortini eru løgtingsgrannskoðararnir kunnugir við, at fjarrit verða koyrd við taxa á teimum størru plássunum, og kann hetta møguliga hava ávirkan á hesar útreiðslur.

*ad 2.* Í revisiónsprotokollini fyri 1980/81 viðmerkir roknskapargrannskoðarin, at tað enn ikki hevur eydnast at fáa tað interna felagsbókhaldið og høvuðsbókhaldið at samsvara. Avtala er gjørd um, at ein neyv avstemming verður gjørd sum skjótast.

*ad 3.* Í revisiónsprotokollini hevur roknskapargrannskoðarin viðmerking um, at vørugoymslan verður ikki eftirkannað av honum. Hetta, vilja vit mæla til, verður gjørt frameftir, av tí at goymsluvirðið av útgerð T.F.L. mangan er fleiri milliónir kr. stórt.

*ad 4.* Telefonverkið fær meir í rentuinntøku við at hava peningin í útlendskum bankum. Upphæddin er nýtt til at rinda skuld til L.M. Erikson.

*ad 5.* Løgtingsgrannskoðararnir hava fingið upplýst, at gomul skuld nú er send til incasso.

Viðvíkjandi rakstrar- og likviditetsberokningum Telefonverksins frá 1982/83 til 1986/87, skrivað av Robert Lefevre Sørensen roknskapargrannskoðara tann 10. mars 1982, hevur hesin á fundi saman við løgtingsgrannskoðarunum greitt frá teimum likviditetsmetingum, hann hevði gjørt viðvíkjandi Telefonverkinum, og tí vánaligu fíggjarstøðu, sum hesin stovnur hevur og kemur at hava ár frameftir. Ein orsøk til hetta er kurstap av dollarlánunum, sum Telefonverkið hevur upptikið.

Hansara metan er, at um Telefonverkið árini frameftir skal hava nakran møguleika at klára seg fíggjarliga, er neyðugt við taksthækkingum við upp til 8 ella 10% árliga umfram tey 25%, sum landsstýrið hevur tilmælt, men sum fíggjarnevndin ikki enn hevur heimilað.

Hann metti eisini, at meira átti at verið gjørt á hesum stovni við eini betri økonomiskari stýring og eini meira nágreiniligari tilrættalegging fíggjarliga. Hann metti eisini, at neyðugt var at seta ein fíggjarstjóra á Telefonverkið.

Av tí at tann tekniska arbeiðsbyrðan er nóg mikið til at upptaka orkuna hjá verandi stjóra, hevur hesin sjálvur skotið upp fyri løgtingsgrannskoðarunum, at settur verður stjóri við fyrisitingarligari og fíggjarligari ábyrgd av stovninum.

Tað er ringt, fyri ikki at siga ómøguligt, hjá einum stovni at skapa sær álit í sambandi við lántøku v.m. við so stórum negativum eginkapitali, sum Telefonverkið sambært nevndu metan kemur at hava árini frameftir, uttan ódnartøk verða tikin, sum kunnu tryggja rakstur og fíggjarstøðu stovnsins.

Hetta er ein átrokandi spurningur, av tí at stovnurin í hesum álmanakkaári noyðist at fáa 80 mill. kr. í tilskoti, harav eginorkan bert er 30 mill. samb. úttalilsi frá Ernst Hansen, bókhaldara.

Í seinastu rakstrarmeting roknskapargrannskoðarans tørvar stovninum 92 mill. kr. í fíggjarárinum 1983/84. Sambært somu rakstrarmeting verður úrslitið áðrenn avskrivingar -:- 31,6 mill. kr. Hetta verður væntandi minni, tá dollarin er fallin nakað í kurs síðan november 1982.

Av tí at fíggjarstøðan hjá T.F.L. er so spent, hava løgtingsgrannskoðararnir lagt sær í geyma, hvussu telefonverkstjórin, bókhaldarin og roknskapargrannskoðarin meta, at raksturin kann koma í eina tryggari legu.

Um fíggjarnevndin ikki heimilar 25% taksthækkingar, verður samlaða lániskuldin við uppruna kursum ikki 220 mill. kr. sum nú, men oman fyri 236 mill. kr., áðrenn 1984 er úti. Bókhaldarin vísti á, at flestu lántøkurnar eru tiknar, eftir at íløgurnar eru gjørdar.

Telefonverkstjórin vísti á, at tað ofta var tvørligt at bíða eftir veðhaldsheimild frá løgtinginum til lán, og helt tað tí vera eitt hugskot, um leiðslan á stovninum hevði eina standandi lániheimild, sum hon so kundi nýta, tá tørvur var á.

Vert er at umhugsa at hækka takstirnar, hóast bókhaldari Telefonverksins hevði ikki serligar vónir um, at hetra fór at [illegible] øking í samlaðu inntøkum stovnsins.

vísa eina minking í nýtsluni av telefonini.

Á frásagnum frá teimum innkallaðu skilst, at eginognin frá stovninum var negativ við 57,0 mill. kr. við árslok 1981/82 inkl. ikki staðfest kurstap við kurs 31/3-1982. Hetta samsvarar við roknskapin.

Á rakstrarmetingini framgekk, at hóast 25% í taksthækking beinanvegin og 5% taksthækking árliga verður eginognin verandi negativ heilt fram til 1986/87.

Rakstrarprognosan sýnir eisini somu døpru mynd viðvíkjandi samlaðu lániskuld stovnsins, sum verður óbroytt á sama høga núverandi støði, sjálvt um gjøldini verða hækkað 25% nú og 5% árliga frá 1983/84 til 1986/87.

Hóast nevndu gjaldshækkingar veksur tann samlaði likviditetstørvurin úr ÷34 mill kr. í komandi fíggjarári upp í ÷98 mill. kr. í 1986/87.

Men roknskapargrannskoðarin upplýsir tó, at telefonverkstjórin vil, í samarbeiði við roknskapargrannskoðaran, útarbeiða eitt nýtt yvirlit fyri komandi ár við tí fyri eyga at fáa javnvág í roknskaparúrslit og eginogn stovnsins.

Løgtingsgrannskoðararnir halda tað vera neyðugt, at stovnurin yvir egnan rakstur lyftir so stóran part av fíggjarbyrðuni sum møguligt sjálvur.

Niðurstøðan hjá løgtingsgrannskoðarunum eftir fundirnar um T.F.L. er, at løgtingið heimilar landsstýrinum at eftirlíka ynskinum hjá telefonverkstjóranum, sum fær fulla undirtøku frá roknskapargrannskoðaranum og bókhaldaranum á T.F.L., at fyrisitingarligur stjóri verður settur á stovnin.

Í øðrum lagi mæla løgtingsgrannskoðararnir tinginum til at áleggja landsstýrinum skjótast gjørligt at finna útvegir fyri, at T.F.L. sleppur burtur úr tí fíggjarliga trongrúmi, stovnurin gongur í. Bókhaldarin boðaði frá, at longu í juni-juli í ár mugu útvegir finnast fyri at gjalda ca. 80 mill. kr. í falnum rentum og avdráttum.

Ár 1983, mánadagin 14. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir Erlendur Patursson og Vilhelm Johannesen fram soljóðandi

**Uppískoytisálit**

Eftir at álitið í løgtingsmáli nr. 49-7/1982 dagfest 11. mars 1983 er framlagt, og vit eru varugir við, at tilfarið, løgtingsgrannskoðararnir

hava arbeitt við, er avskeplað og verður misnýtt í ávísum blað, vilja undirritaðu løgtingsgrannskoðarar gera hesar viðmerkingar:

Í álitinum verður sagt á síðu 2: »Hetta er ein áttrokandi spurningur, av tí at stovnurin í hesum almanakkaárinum noyðist at fáa 80 mió.kr. í tilskoti, harav eginorkan bert er 30 mió.kr. sambært úttalilsi frá Ernst Hansen, bókhaldara.«

Sambært upplýsingar frá roknskapargrannskoðaranum hjá telefonverkinum og frá stjóranum á stovninum er talan í høvuðsheitum um tvinni dollarlán hvørt uppá 5 mió. dollar. Annað fellur til gjaldingar 19. juli 1983. Hitt fellur til gjaldingar 15. december 1983. Talan er sostatt um umlegging av stuttfreistaðum lánum til meiri langfreistað lán. Sostatt er talan ikki um, at telefonverkið skal hava nakað tilskot í hesum sambandi. Hetta hevur ongatíð verið upp á tal.

Tá stjórin á telefonverkinum var á fundi saman við løgtingsgrannskoðarunum, kom hesin inn á spurningin um útbyggingina av Støðini í Havn. Hetta er ikki við í álitinum. Stjórin vísti á, at seinkanin av útbyggingini av støðini í Havn í eini seks til sjey ár beinleiðis hevur kostað telefonverkinum 35-40 mió.kr. Hesin missur stendst lutvíst av vanligari príshækking fyri útbyggingina og av mistari inntøku av vanligari telefonnýtslu, eins og verkið í longri tíð ikki kundi ganga umsóknum um telefon á møti. Varð útbyggingin framd sum ætlað, var lániskuldin hjá stovninum munandi minni í dag.

Á síðu 3 í álitinum verður sagt: »Av tí at tann tekniska arbeiðsbyrðan er nóg mikið til at upptaka orkuna hjá verandi stjóra, hevur hesin sjálvur skotið upp fyri løgtingsgrannskoðarunum, at settur verður stjóri við fyrisitingarligari og fíggjarligari ábyrgd av stovninum.« Hesin parturin av álitinum er avskeplaður. Hvørki stjórin ella nakar annar hevur nýtt heitið stjóri í tí týdningi, sum formaðurin í løgtingsgrannskoðaranevndini nú tykist at leggja í hetta. Stjórin tosaði um ein skrivstovustjóra á sama hátt, sum landsstýrið hevur góðkent viðvíkjandi interkommunala elfelagnum SEV. Roknskapargrannskoðarin hjá stovninum nýtti heitið »økonomichef«.

Formaðurin í grannskoðaranevndini roynir at geva leiðsluni á telefonverkinum ábyrgdina av, at útbyggingin av telefonini er fíggjað við uttanlandslánum. Her mugu vit gera vart við, at avgerðin um at fíggja útbyggingina við uttanlandslánum er tikin av skiftandi landsstýrum og skiftandi løgtingum tey seinastu 10 árini. Øll uttanlandslánini eru tikin sambært løgtingslógir. Allar hesar lógir eru samtyktar av skiftandi tingum eftir uppskoti frá skiftandi landsstýrum.

Út frá tí, sum her er ført fram, loyva vit okkum at seta fram soljóðandi uppskot til samtyktar ístaðin fyri uppskotið í álitinum dagfest 11. mars 1983.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

»Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82.«

2. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Tann 14. mars 1983 hava løgtingsgrannskoðararnir lagt fram álit dagfest 11. mars 1983 viðvíkjandi góðkenning av roknskapunum hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1977/78 til og við 1981/82 saman við viðmerkingum.

Við 2. viðgerð tann 23. mars 1983 varð málið beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 11. apríl 1983 viðgjørt málið og varð samtykt at leggja málið aftur fyri tingið við soljóðandi

**Uppskoti**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyrinevndu roknskapir hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80, 1980/81 og 1981/82.

2. viðgerð 2. mai. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 24-0 atkvøðum.

# 50. Lóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum

Ár 1982, fríggjadagin 17. december legði serlig 6-manna nevnd, EDV-nevndin, fram soljóðandi

## Álit

Í løgtingssetuni 1981 legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um fólkayvirlit (tingmál nr. 75/1981), løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum (tingmál nr. 74/1981) og løgtingslóg um privatar skráir (tingmál nr. 81/1981).

Øll málini vóru viðgjørd undir einum og beind í eina serliga seks-mannanevnd.

Tað eydnaðist bert nevndini at viðgera lógina um fólkayvirlit lidna, áðrenn tingsetan endaði. Tingið samtykti tí, at nevndin skuldi halda fram sum millumtinganevnd til viðgerðar av tingmáli nr. 74/1981: Almennar skráir og tingmáli nr. 81/1981: Privatar skráir.

Í hesum áliti verður bert uppskotið til løgtingslóg um almennar skráir viðgjørt, meðan uppskotið um privatar skráir verður viðgjørt í áliti, sum kemur seinni.

Endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja, at EDV-skráir hjá almennum myndugleikum, sum innihalda persónsupplýsingar, ikki

verða stovnaðar ella nýttar soleiðis, at tær ganga borgarunum ov nær, ella at upplýsingar kunnu verða misbrúktar.

Eftir galdandi lóggávu eru ongar vanligar reglur um, hvat ið ein kann skráseta í almennum EDV-skráum ella eftirlit við tílíkum. Einastu verjureglur eru vanligu reglurnar í revsilógini um tøgnskyldu í almennari tænastu og reglurnar um frið einstaklingsins.

Fyri at verja tann einstaka móti misnýtslu við EDV-skráseting verða í lógini ásettar m.a. fylgjandi reglur:

1) Skrásetast mugu bert upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at skráin fær røkt sítt endamál, og skal tað av góðkendari forskrift framganga, hvat endamálið er við skránni.
2) Skrásettir persónar hava rætt til at fáa at vita, hvat ið er skrásett um teir.
3) Reglur um, at upplýsingar ikki verða latnar óviðkomandi.
4) Skylda til at rætta skeivar upplýsingar og at strika upplýsingar, sum longur ikki hava týdning fyri endamálið hjá skráini.

Til at hava eftirlit við, at lógarreglurnar verða hildnar, verður settur á stovn eitt skrásetingareftirlit. Uppgávan hjá eftirlitinum verður í høvuðsheitum hendan:

1) At geva ummæli um forskriftir fyri EDV-skráir, áðrenn hesar verða góðkendar av landsstýrinum ella bygdarráðunum.
2) At hava eftirlit við stovnsettum skráum.
3) Eftir áheitan frá einstaklingum ella lækna at viðgera ynskir um at fáa rætt til at kanna, hvat skrásett er um ein sjálvan.

Harafturat kemur skrásetingareftirlitið at hava eftirlit við privatum skráum og eftirlit við øðrum ikki EDV-førdum skráum eftir landsstýrisins avgerð.

Talið av EDV-skráum við persónsupplýsingum undir heimastýrinum (landsstýrinum og kommununi), sum koma undir lógina, eru í løtuni bert umleið 12, men kann roknast við, at talið kemur at vaksa skjótt komandi árini.

Undir 1. viðgerð og í skrivi til landsstýrið dagfest 11. mars 1982 hevur ríkisumboðsmaðurin gjørt vart við, at løgtingið bert hevur heimild til at lóggeva fyri EDV-skráir, sum verða førdar fyri myndugleikar undir heimastýrinum. EDV-skráir, sum verða førdar fyri ríkismyndugleikar í Føroyum, koma at hoyra undir donsku lógina um EDV-skráir. Ætlanin er at seta hesa lóg í gildi fyri statsstovnar. Nevndin hevur so statt skotið upp at broyta greinirnar 1 og 4 í lógaruppskotinum soleiðis, at lógin bert hevur at umfata fyrisitingarmál undir heimastýrinum.

Frá ymsum fakfeløgum hevur løgtingið móttikið yvirlýsing frá fundi 10. november 1982. Til áheitanina í yvirlýsingini er at siga, at nevndin hevur skotið upp at geva fakfeløgunum umboðan í skrásetingareftirlitinum. Nevndin hugsar sær, at annað av umboðunum fyri lønmóttakarafeløgini og annað av umboðunum fyri arbeiðsgevararnar koma at umboða sjóvinnufeløgini.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fundir við landslæknan, Petur Zachariasen, deildarleiðara á Fróðskaparsetrinum, og Sigurð Poulsen, leiðara á Hagdeildini, har umrøddir vóru ávísir spurningar um undantaksreglur frá strongu lógarkrøvunum kunnu gerast, tá talan er um data-viðgerð av vísindaligum hagfrøðiligum tilfari. Nevndin heldur tað ikki vera nakra orsøk til at hava serstakar undantaksreglur frá vanligu lógarreglunum, sjálvt um talan er um viðgerð av vísindaligum hagfrøðiligum tilfari, og hevur tí skotið upp at strika umrøddu undantaksreglu, samanber §4, stk. 3, og §6, stk. 4, §7, stk. 3.

Eftir nýggju lógini um fólkayvirlit fekk landsstýrið heimild at geva hvørjum persóni eitt persónsnummar, tí hetta var mett neyðugt í sambandi við ætlaðu samtíðarskattaskipanina. Fyri at avmarka nýtsluna av persónsnummari hevur nevndin skotið upp í §9, stk. 2, at áskta, at persónsnummar bert kann nýtast í skráum, um hetta er neyðugt fyri at kunna røkja sína skyldu mótvegis skattavaldinum.

Eisini á øðrum økjum hevur nevndin skotið upp at gera reglurnar fyri EDV-skráseting strangari, t.d. verður skráseting av politiskum viðurskiftum ikki loyvd, samanber uppskot um broyting í §9, stk. 2. Skotið verður eisini upp at lata yrkisfeløgini fáa umboðan í skrásetingareftirlitinum.

Nevndin hevur býtt seg í 3 bólkar.

Størsti bólkurin (Edmund í Garði, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 74/1981: Lóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við fylgjandi

**Broytingum**

| | |
|---|---|
| 1) Í lógaryvirskriftini verður »lóg« broytt til »løgtingslóg«. | 1) I lovens overskrift ændres »lov« til »lagtingslov«. |
| 2) Í §1, stk. 1, verður aftaná | 2) I §1, stk. 1, tilføjes efter |

orðini »almennu fyrisitingina« sett: »undir heimastýrinum«.

ordene »den offentlige forvaltning«: »under hjemmestyret«.

3) Í §4, stk. 1, verða orðini »lands- ella ríkismyndugleika« broytt til: »landsmyndugleika«.

3) I §4, stk. 1, ændres ordene »lands- eller statsmyndighed« til: »landsmyndighed«.

4) Í §4, stk. 3, §4, stk. 4 og §7, stk. 3 verður orðið »ymisk« broytt til »hvør sítt«.

4) uændret.

5) Í §4, stk. 3, gongur seinasta punktum út.

5) I §4, stk. 3, udgår sidste punktum.

6) Í §6, stk. 4, gongur seinasta punktum út.

6) I §6, stk. 4, udgår sidste punktum.

7) Í §7, stk. 3, gongur seinasta punktum út.

7) I §7, stk. 3, udgår sidste punktum.

8) Í §8, stk. 2, 1. punktum, verður aftaná orðini »sum settar« sett: »eru«.

8) uændret.

9) Í §8, stk. 2, gongur seinasta punktum út.

9) I §8, stk. 2, udgår sidste punktum.

10) Í §9, stk. 2, 1. pkt. ganga út orðini: »sum ikki eru atkomandi hjá almenningi.«

10) I §9, stk. 2, udgår ordene: »som ikke er offentligt tilgængelige«.

11) Í §9, stk. 2, verður skoytt uppí: »Persónsnummar hava bert onnur enn fólkayvirlitini loyvi at skráseta og nýta, um hetta er neyðugt til at kunna røkja sínar skyldur mótvegis skattavaldinum,

11) I §9, stk. 2, tilføjes: »Personsnummer kan kun andre end folkeregistrene registrere og benytte, såfremt dette er nødvendigt for at kunne opfylde sine forpligtelser overfor skattevæsenet, som

sum eisini er tann einasti, sum kann nýta samkoyring.«

også er den eneste, der kan benytte samkøring.«

12) Í §11 verður orðið »Tørvandi« broytt til »Neyðugt«.

12) Uændret.

13) Í §12, stk. 1, verður orðið »Tørvandi« broytt til »Neyðug«.

13) Uændret.

14) Í §13, stk. 5, 1. punktum, verður aftaná orðið »gera« sett: »vísindaligar« og aftaná 1. punktum verður innskotið: »Hesar upplýsingar skulu ikki kunna vísa til ávísar persónar í samfelagnum.«

14) I §13, stk. 5, 1. punktum indsættes efter ordet »foretage«: »videnskabelige« og efter 1. punktum indskydes: »Disse oplysninger må ikke kunne vise til bestemte personer i samfundet.«

15) Í §16, stk. 1, ganga út orðini »ella upplýsingarnar frammanundan eru atkomandi hjá almenningi.«

15) I §16, stk. 1, udgår ordene »eller oplysningerne i forvejen er offentligt tilgængelig«.

16) Í §17 verður 1. punktum orðað soleiðis: »Upplýsingar um ávís fólk er loyvt at lata víðari til privat virki og onnur, sum sambært lóg ella avtalu hjálpa til at greiða arbeiðið hjá avvarðandi myndugleika.«

16) Uændret

17) Í §18, stk. 3, verður 2. punktum orðað soleiðis: »At lata upplýsingar víðari til ætlaða samkoyring við skrá, sum lógin ikki fatar um, er bannað.«

17) I §18, stk. 3, affattes 2. punktum således: »Videregivelse af oplysninger med henblik på samkøring med registre, der ikke omfattes af loven, er forbudt.«

18) Í §19, stk. 2, gongur 2. punktum út.

19) §23 verður orðað soleiðis: »Eftirlitið, sum landsstýrið setir, er skipað av formanni, sum skal vera løgfrøðingur, 1 datakønum limi, 1 limi við kunnleika til fyrisiting, 2 limum umboðandi lønmóttakarafeløgini og 2 limum umboðandi arbeiðsgevarafeløgini. Limirnir og varamenn teirra vera útnevndir fyri 4 ár.«

20) I §25, stk. 2, verður aftaná orðini »Limirnir og« sett: »leiðandi«.

21) óbroytt

22) Í §27, stk. 1, verður orðið »kann« broytt til »skal«.

23) I §27, stk. 2, ganga út orðini »§18, stk. 3« og »§19, stk. 2«.

24) Í §29, stk. 1, verða orðini »1. apríl 1982« broytt til »1. apríl 1983«.

18) I §19, stk. 2, udgår 2. punktum.

19) §23 affattes således: »Tilsynet, der nedsættes af landsstyret, består af en formand, der skal være jurist, 1 datakyndigt medlem, 1 medlem med administrativ erfaring, 2 medlemmer repræsenterende lønmodtagerorganisationerne og 2 medlemmer repræsenterende arbejdsgiverorganisationerne. Medlemmerne og stedfortrædere for disse udnævnes for 4 år.«

20) I §24, stk. 2 indføjes efter ordene »Tilsynets medlemmer og«: overordnet«.

21) I §25, stk. 2, ændres ordet »behørlig« til »behørig«.

22) I §27, stk. 1, ændres ordet »kan« til »skal«.

23) I §27, stk. 2, udgår ordene »§18, stk. 3« og »§19, stk. 2«.

24) I §29, stk. 1, ændres ordene »1. april 1982« til »1. april 1983«.

Ein minniluti (Adolf Hansen) kann taka undir við størsta nevndarbólkinum við undantak av broytingunum 2) og 3), har mælt verður til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Heldur ikki kann verða tikið undir við broyting 1!), men verður í staðin sett fram fylgjandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| I §9, 2. stk. verður upp í:<br>»Persónsnummar má umframt av fólkayvirlitinum bert nýtast av skattamyndugleikunum og bert í skattamálum.« | I §9, stk. 2 tilføjes:<br>»Personnummer må foruden af folkeregistrene kun benyttes af skattemyndighederne og kun i skattesager.« |

Ein annar minniluti, umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) hevur verið við saman við meirilutanum til at gera flestu broytingaruppskotini til landsstýrisuppskotið.

Tikið verður av somu grund undir við teimum generellu viðmerkingunum og við øllum broytingaruppskotunum uttan punktunum 2, 3, 11 og 19.

Hesar broytingar eru sum kunnugt ætlaðar til at fyribyrgja edv-misnýtslu, sum er vorðin ein álvarsamur trupulleiki í okkara grannalondum.

Arbeiðið í nevndini er farið fram, áðrenn landsstýrið legði uppskot til samtyktar fyri løgtingið um samtíðarskatt.

Nevndarlimirnir hava ferð eftir ferð sóknast eftir innihaldinum í hesum uppskoti, so teir kundu taka hetta við í sínari umhugsan í sambandi við lógina um almennar EDV-skráir.

Sum kunnugt eru limunum sýttar allar upplýsingar um samtíðarskattaskipanina, og hava teir tí ikki í sínum nevndararbeiði kunnað tikið hædd fyri ávísum álvarsamum EDV-spurningum í hesari skipan.

Aftan á at nevndin mest sum hevur endað sítt arbeiði, leggur landsstýrið samtíðarskattauppskotið fyri løgtingið. Við hesum uppskoti er týðiliga tilætlað ein so umfatandi samanblanding av almennum og privatum data-áhugamálum, at umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin ikki kunnu góðtaka hesa tilætlan.

Undir fyrstu viðgerð av samtíðarskattamálinum upplýstu umboð fyri samgonguna, at privatir peningastovnar og EDV-fyritøkur skulu umsita ein stóran part av samtíðarskattaskipanini.

Við hesum er ein týðandi samfelagsuppgáva latin privatum.

Hetta er ikki ætlað sum ein yvirgangsloysn, til bíðað verður eftir einum almennum skattastovni við egnari EDV-miðstøð, men verður gjørt av principiellum grundum, upplýstu umboð fyri samgonguna undir viðgerðini av samtíðarskattamálinum.

Minilutin metir, at hesin umsitingarháttur ber í sær vandan fyri, at

privatir peningastovnar og EDV-virkir sum frá líður fara at sita inni við umfatandi og heilt óviðkomandi upplýsingum um privat viðurskifti hjá borgarunum.

Hetta er nakað, sum kann gerast ein hóttan ímóti persónligu trygd, frælsi og privatlívi einstaklingsins.

Tað er sostatt eftir minnilutans tykki tørvur á nógv strangari reglum fyri nýtslu av persónsnummari og fyri samankoyring av skráum, ið skulu tæna skattavaldinum.

Somuleiðis metir minnilutin, at eftirlitsnevndin ikki eigur at verða vald av landsstýrinum, men av avvarðandi stovnum og felagsskapum sjálvum. Eisini heldur minnilutin tað vera beinast, at løgtingið og brúkarafelagið verða umboðað í nevndini.

Út frá hesum viðmerkingum setir minnilutin (umboð javnaðarfloksins og tjóðveldisfloksins) hesi punkt í staðin fyri punktini hjá meirilutanum:

(2) og (3) verða orðað sum upprunauppskot landsstýrisins.
(11) Tekst verður orðað soljóðandi:

»Persónsnummar hava bert almennir stovnar loyvi at skráseta og nýta, um hetta er neyðugt, fyri at teir skulu kunna røkja skyldur sínar mótvegis skattavaldinum, ið er einasti myndugleiki, sum kann nýta samkoyring.«

(19) verður orðað soleiðis:

»Eftirlitið verður skipað á henda hátt:
*Sorinskrivarin* tilnevnir formannin, ið skal vera løgfrøðingur.
*Føroya Løgting* tilnevnir 2 limir, ið báðir skulu vera datakønir og óheftir av privatum dataáhugamálum.

*Løntakarafeløgini* á landi tilnevna tveir limir.
*Løntakarafeløgini* á sjógvi tilnevna tveir limir í eftirlitsnevndina.
*Brúkarafelagið* tilnevnir ein lim.

Limir og tiltakslimir sita í minsta lagi 4 ár. Teir kunnu verða afturvaldir.

At enda skal minnilutin (javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin) vísa á, at hann hevur kravt lógina um privatar skráir avgreidda samstundis við lógini um almennar skráir, men hesum hevur meirilutin ikki viljað eftirlíkað.

**Rigsombudsmanden**
**på Færøerne** 11. mars 1982

Færøernes landsstyre
Tórshavn

I tilslutning til mine udtalelser ved 1. behandlingen af lagtingslovforslaget om offentlige myndigheders registre, lagtingssag nr. 74/1981 og min skrivelse herom af 19. januar 1982 til Færøernes landsstyre, hvoraf lagtinget har modtaget en kopi, skal jeg oplyse, at jeg gennem statsministeriet har modtaget en supplerende udtalelse fra justitsministeriets lovafdeling om, hvilke registre lagtingsloven kan omfatte.

Af justitsministeriets udtalelse fremgår det, at regler om offentlige myndigheders registrering er forvaltningsprocessuelle regler på linie med regler om offentlighed i forvaltningen og regler om tavshedspligt. Folketinget har således kompetence til at lovgive om den registrering, der foretages for rigsmyndigheder, medens lagtinget har kompetance at lovgive om den registering, der foretages for færøeske myndigheder. Registre føres *for* den myndighed, der forestår forvaltningen af et sagsområde, jfr. bl.a. folketingstidende 1977/78, tillæg A, sp. 677.

Justitsministeriet har udtalt følgende:

1. Registre, der føres for en rigsmyndighed vedrørende administrationen af et fællesanliggende, omfattes af dansk registerlovgivning.
2. Registre, der føres for en færøsk myndighed vedrørende administrationen af et særanliggende, omfattes af færøesk lovgivning.

3. Registre, der føres for en færøsk myndighed vedrørende administrationen af et fællesanliggende, omfattes af færøsk lovgivning.

4.a. Registre, der udelukkende føres for en rigsmyndighed i forbindelse med varetagelsen af opgaver, der er overtaget som særanliggende, men hvor opgaven udføres af en rigsmyndighed, omfattes af den danske lov om offentlige myndigheders registre. I hvilket omfang, de færøske myndigheder kan stille nærmere krav til udøvelsen af den pågældende rigsmyndigheds administration af området, må afgøres på grundlag af den aftale m.v., der ligger til grund for, at rigsmyndigheden udøver administrationen af det pågældende område. Det vil dog ikke kunne aftales eller bestemmes, at rigsmyndighederne skal anvende registre på en måde, der er i strid med, hvad der vil kunne fastsættes inden for rammerne af den danske registerlov, således som den sættes i kraft på Færøerne.

Landfogeden på Færøerne har over for justitsministeriet oplyst, at det for tiden overvejes at overføre kørekortregisteret på edb, og at registeret vil komme til at indeholde oplysninger, der udelukkende skal indhentes og benyttes af politiet. Dette register skal således udelukkende føres for en rigsmyndighed og vil derfor være omfattet af den danske lov om offentlige myndigheders registre, når den sættes i kraft på Færøerne. Det er uden betydning, om registere faktisk bliver ført *af* andre end politiet, eks. et privat serviceburcau, og om udgifterne til oprettelse og drift eventuelt afholdes af hjemmestyremyndighederne. Det er ligeledes uden betydning, at oplysningerne eller en del heraf eventuelt videregives til de færøske myndigheder som et led i samarbejdet mellem myndighederne.

b. Der kan endvidere tænkes tilfælde, hvor det findes hensigtsmæssigt, at et register oprettes og anvendes af en hjemmestyremyndighed og en rigsmyndighed i fællesskab, således at registeret føres for begge disse myndigheder. I sådanne tilfælde vil registeret i princippet blive reguleret af såvel den lovgivning, der overvejes af det færøske hjemmestyre, som af den danske lov om offentlige myndigheders registre.

I tilfælde, hvor den ene myndighed alene får løst en opgave, der er underordnet i forhold til registerets samlede opgaver, må det dog antages, at registeret udelukkende skal reguleres af de regler, der gælder for den myndighed, som registeret i det væsentlige føres for.

5. Registre ført af selskaber, institutioner, foreninger m.v., som landsstyret i medfør af §2 i forslaget til lagtingslov kan henføre under lagtingslovens bestemmelser, hvis udgifter ved disse institutioners virksomhed overvejende dækkes af midler fra land, stat eller kommuner, omfattes af færøsk registerlovgivning, uanset om rigsmyndighederne afholder alle udgifter, idet disse institutioner m.v. så vidt det kan afgøres, ikke har karakter af rigsmyndigheder.

Justitsministeriets synspunkter synes at kunne tilgodeses ved, at §1, stk. 1, i lagtingsloven affattes således:

»§1. Loven gælder for EDB-registre, der føres for hjemmestyrets offentlige forvaltning, og som indeholder personoplysninger« samt ved, at §4, stk. 1, affattes således:

»§4. Registre, der føres for en landsmyndighed, må kun oprettes i henhold til godkendelse af landsstyret.«

Niels Bentsen/Jørgen Damgaard Hansen
fm.

**Yvirlýsing til Føroya Løgting**

Fakfeløg, savnað á fundi í Havn mikukvøldið 10. nov. 1982, loyva sær at mæla løgtinginum frá at samtykkja lógaruppskotini frá landsstýrinum um almennar og privatar EDV skráir, soleiðis sum tey fyriliggja.

Feløgini meta, at ov nógvir leysir endar eru í lógaruppskotunum, og at tey nøkta á ongan hátt tað krav til tryggleika, sum ein og hvør borgari eigur at hava, fyri ikki at koma út fyri inisnýtslu, bæði alment og privat.

Feløgini mæla harðliga til, at lógirnar gjølla áseta, hvat loyvt er viðvíkjandi savnan, miðsavnan og útflýggjan av persónligum upplýsingum, sum verða førdar á dataskráir.

Feløgini leggja alstóran dent á, at tað ikki skal vera loyvt t.d. at hava uplýsingar frá sjúkrahúsunum, løgregluni, almannamyndugleikum og líknandi í somu datakervum.

Fakfeløgini krevja at verða tikin við millum teirra, sum fáa sæti í eftirlitinum við datalógunum og reglugerðunum.

Hesi feløg meta eisini, at effektivitetskontrol má ikki verða skrásett av einstøkum, har ið tímalønin verður brúkt sum grundarlag fyri útgjalding.

| | |
|---|---|
| Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag | v/Hergerð Joensen |
| Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag | v/Kári Poulsen |
| Havnar Arbeiðsmannafelag | v/Karl Johansen |
| Havnar Arbeiðskvinnufelag | v/Osla Andresen |
| Føroya Arbeiðarafelag | v/Jóhs. Olsen |
| Føroya Fiskimannafelag | v/Óli Jacobsen |
| Meginfelag Útróðrarmanna | v/Í. Matras |
| Dansk Sygeplejeråd Før. deild | v/Sólvá Patursson |
| Samstarv | v/Kristianna Rein |
| S&K | v/H. Dam |
| HK Føroya deild | v/P.O. Hansen |
| Førova Handverkarafelag | v/Høgni Højgaard |

2. viðgerð 20. januar 1983. Atkvøðugreiðsla fór fram ímóti uppskoti um at beina málið aftur í nevnd, sum fall við 12-0. Málið varð sostatt beint aftur í edv-nevndina, sum 21. januar legði fram soljóðandi

**Álit**

Tann 17. december 1981 legði serliga edv-millumtinganevndin fram álit í hesum máli. Undir 2. viðgerð 20. januar 1983 varð málið beint aftur í nevndina til viðgerðar.

Eftir uppskoti landsstýrisins skal lógin fevna um edv-eftirlitið við allari almennu fyrisitingini í Føroyum, t.v.s. eisini hjá fyrisitingini hjá ríkisstovnunum í Føroyum.

Aftan á framløguna er komið skriv frá ríkisumboðnum, har mett verður, at løgtingið ongá heimild hevur til at lóggeva fyri ríkisstovnar á hesum øki, smbr. skjal til fyrra álitið.

Í fyrra álitinum mælti tann størsti bólkurin til at samtykkja uppskot landsstýrisins við ymiskum broytingum, m.a. teimum, at lógin bert kom at fevna um føroysku fyrisitingina, smbr. pkt. 2 og 3 í broytingaruppskotinum.

Undir viðgerðini av málinum hevur Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, verið á fundi í nevndini. Landsstýrið hevur ikki tikið støðu til at broyta nakað í sínum uppskoti aftan á móttøkuna av skrivinum frá ríkisumboðsmanninum.

Verður løgtingslógin samtykt, soleiðis at hon eisini kemur at fevna um fyrisiting ríkisins í Føroyum, og ríkismyndugleikarnir halda, at heimastýrið ikki hevur nakran avgerðarrætt á hesum øki, kann málið leggjast fyri nevndina eftir §6 í heimastýrislógini til avgerðar.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og hevur býtt seg í 4 minnilutar.

Ein minniluti (Olaf Olsen og Frederik Olsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teimum í fyrra álitinum tilskilaðu broytingum við undantak av broytingunum 2 og 3.

Ein annar minniluti (Eli Nolsøe) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við teimum broytingum (1-24), sum størsti bólkurin í fyrra álitinum mælti til.

Ein triði minniluti (Adolf Hansen) kann taka undir við størsta bólkinum í fyrra álitinum við undantak av broyting 11 og setir í staðin fyri fram fylgjandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í §9, stk. 2, verður skoytt uppí: | I §9, stk. 2, tilføjes: |
| »Persónsnummar má umframt av fólkayvirlitinum bert nýtast av skattamyndugleikunum og bert í skattamálum.« | »Personsnummer må foruden af folkeregisteret kun benyttes af skattemyndighederne og kun i skattesager.« |

Ein fjórði minniluti (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) vísir til minnilutaálit teirra í fyrra álitinum.

1. juni løgdu Petur Reinert og Jóannes Dalsgaard fram soljóðandi

**Minnilutaálit**

Minnilutin sær onga orsøk til at útseta endaligu avgerðina í hesum máli til, ið hvussu so er, aftan á ólavsøku í ár.

Nevndin hevur arbeitt við málinum, og málið tná sigast at vera endaliga viðgjørt í nevndini.

Allir nevndarlimir hava tikið støðu í málinum, og orsøkin til, at álitið, sum er undirskrivað av øllum nevndarlimum uttan einum, ikki er komið á tingborð fyri langari tíð síðani, er tann einfalda, at álitið í sjálvum sær inniber spurning um tulking av heimastýrislógini.

Minnilutin dugir ikki at siggja annað, enn at hetta eins og ávís onnur mál er ein spurningur, sum tað ber væl til hjá landsstýrinum at tala seg til rættis við ríkismyndugleikarnar um. Vit halda, at løgmaður hvørki hevur sýnt vilja ella hepni at umsita heimastýrislógina

hevur lyndi til at nýta hetta mál sum koyril í innanhýsis klandri samgonguflokkanna millum — serstakliga tá hann vil hava samgonguna at føra amtstøðusambandspolitikk í staðin fyri smidligan samráðingarpolitikk. Vilja samgonguflokkar løgmans ikki ganga undir hansara treytir, hóttir hann teir við at hevna seg við at fella málið um samtíðarskattaskipan, um teir ikki kyssa koyril hansara.

Minnilutin vil minna á, at eftirlitið við almennum EDV-skráum er av so grundleggjandi týdningi í samtíðarskattaspurninginum, at tað ikki ber til at skilja hesar spurningar sundur. Tað er tí ábyrgdarleyst av samgonguni at samtykkja eina samtíðarskattaskipan og eina innkrevjingarskipan gjøgnum privatar stovnar uttan samstundis at tryggja frælsi og rættindi borgaranna til frið privatlívsins við at samtykkja lóggávu um eftirlit við almennum EDV-skráum.

Í tráð við ta mannagongd, sum varð fastløgd av løgtingsformanninum nú um dagarnar viðvíkjandi framløgu av álitum frá løgtingsnevndum, vil minnilutin tí krevja, at álitið frá EDV-nevndini verður framlagt og viðgjørt í tí líki, sum teir fýra av fimm nevndarlimum hava undirskrivað.

Út frá hesum mælir minnilutin Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert løgtinginum til at taka álit II hjá EDV-nevndini til viðgerðar beinanvegin.

1. juni løgdu Olaf Olsen, Frederik Olsen, Eli Nolsøe og Asved Djurhuus fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Serliga EDV-tingnevndin heldur fram sum milluntinganevnd til at viðgera tingmálið um almennar skráir gjøllari.

Framhaldandi 2. viðgerð 1. juni. Uppskotið til samtyktar frá meiriluta í nevndini samtykt við 18-0 og frá minniluta fall við 13-0 atkvøðum.

# 51. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi

Ár 1983, mikudagin 19. januar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 21. december 1982 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1983.

**Viðmerkingar:**

Sambært skipanini millum Føroyar og Noreg um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskirættindi dagfest 7. februar 1979 (løgtingsmál nr. 49/1976) skulu partarnir fyri eitt ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu um sínámillum fiskiskap í 1983 vórðu hildnar tann 20. og 21. december 1982 í Keypmannahavn. Partarnir samdust tá um viðløgdu skipan.

Fyri veiðuna av vanligum matfiski ber skipanin fyri 1983 í sær, *at*, føroysk skip á norskum fiskiøki norðan fyri 62° n.br. (íroknað »gráa økið«) og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard fáa loyvi at veiða 5.200 tons, harav toskur 3.500 tons, hýsa 500 tons og annar fiskur 1.200 tons (í 1982 tilsamans 5.500 tons, harav ávikavist 3.800 tons av toski, 500 tons hýsa og 1.200 tons av øðrum). Av »øðrum« (kongafiskur, upsi, svartkalvi) er bert loyvt at veiða 500 tons av hvørjum slagi, og umfatar kvotan eisini hjáveiðuna í øðrum fiskiskapi.

Umframt norsku toskukvotuna í Barentshavinum er avtalað, at 4.500 tons av tí kvotu, ið føroyingar hava fingið frá Sovjetsamveldinum kunnu veiðast í norskum sjógvi (í 1982 5.900 tons). So statt

kunnu tilsamans 8.000 tons av toski verða veidd sambært sáttmálan, mótvegis 7.700 tons av toski í 1982.

Norsk skip fáa í føroyskum sjógvi loyvi at veiða 7.000 tons av botnfiski, ið er sama veiðunøgd sum í 1982. Upsaveiðan má ikki fara upp um 1.000 tons (í 1982 2.000 tons). Í loyvdu veiðuni er íroknað hjáveiðu upp til 1.000 tons; av hvørjum fiskaslagi má hjáveiðan ikki fara upp um 500 tons.

Viðvíkjandi sínámillum fiskiskapi av ídnaðarfiski ber skipanin í sær, at føroysk skip fáa loyvi at veiða 20.000 tons (sama nøgd í 1982), av hvítingsbróður, nebbasild, svartkjafti og brislingi sunnan fyri 62° N. Av hesum 20.000 tonsunum má veiðan av brislingi í mesta lagi verða 3.000 tons (sama nøgd sum í 1982). Norðan fyri 62° N er loyvt føroyskum skipum í royndarfiskiskapi at veiða upp til 5.000 tons av svartkjarti. Av lodnu verður loyvt í Barentshavinum og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard at veiða 15.000 tons, harav upp til 5.000 tons sum vetrarlodna (sama nøgd sum í 1982).

Sum hjáveiða í ídnaðarfiskiskapinum sunnan fyri 62° N er loyvt føroyingum at veiða upp til 500 tons av upsa.

Eftir at Noreg í 1980 setti 200 fjórðinga fiskimark rundan um Jan Mayen, ynsktu føroyingar at fáa kvotur á hesum fiskiøki, ið kundu loyva framhaldandi veiðu har. Sambært avtaluni kunnu føroyingar í 1983 veiða 5.000 tons av svartkjafti við Jan Mayen (sama nøgd sum í 1982). Vegna støðuna hjá lodnustovninum vildu norðmenn ikki bjóða nakra kvotu fyri 1983 (onga kvotu í 1982, 2.500 tons í 1981), men søgdu teir seg til reiðar at umhugsa spurningin av nýggjum, um nettokvota var ásett fyri norskari veiðu í 1983.

Fyri 1983 er avtalað ein sínámillum veiða av makreli innan fyri eina kvotu upp á ávikavist 4.000 tons til føroyingar og 12.000 tons til norðmenn (í 1982 var royndarveiðan ávikavist 4.000/4.000 tons, seinni sama ár hækkað til ávikavist 8.000 tons av makreli og 600 tons av upsa til føroyingar og 10.000 tons av makreli til norðmenn).

Norsk skip fáa loyvi at veiða 30.000 tons av svartkjafti (í 1982: 71.000 tons) við tilsamans 50 skipum (60 í 1982). Av skipunum mugu bert 16 (sum í 1982) verða á fiskileið í senn, umframt 10 (sum í 1982), ið hava loyvi til at leita eftir svartkjafti uttan fyri eina av vaktar- og bjargingartænastuni til eina og hvørja tíð ásetta høvuðsfiskileið. Av nevndu nøgd av svartkjafti kunnu 15.000 tons (sum í 1982) veiðast fyri tíðarskeiðið 10. apríl til 10. juni.

Í 1983 verður norska brugduveiðan undir Føroyum tann sama sum í 1982, 150 tons av livur.

Samanumtikið kann sigast, at veiðusáttmálin við Noreg fyri árið 1983 er á umleið sama støði sum 1982-sáttmálin. Tó kann nevnast, at svartkjaftakvotan hjá Noregi fer munandi niður og makrelkvotan upp. Toskakvotan frá Noregi á norskum øki fer nakað niður, men hetta verður meira enn uppvigað av vøkstrinum í toskakvotuni frá Sovjetsamveldinum á norskum øki.

Tá ið hetta verður sæð saman við veiðusáttmálanum við Sovjetsamveldið fyri 1983, verður úrslitið munandi betri líkindi hjá føroyingum at veiða tosk í Barentshavinum í 1983, samanborið við undanfarin ár.

Sum nakað nýtt umfatar sáttmálin við Noreg føroyska rækjuveiðu við Svalbard. Frá norskari síðu varð avtalan treytað av, at føroyska rækjuveiðan við Svalbard varð avmarkað, antin við kvotu ella hámarki á veiðuorkuni. Sum lið í sáttmálanum gingu føroyingar við til, at orkan var avmarkað til 9 skip, har í mesta lagi 5 skip kundu fiska í senn.

Eitt yvirlit yvir tey skip, ið ætla at taka lut í sínámillum fiskiskapinum í 1983, skal verða avvarðandi føroysku og norsku myndugleikunum í hendi innan 1. februar 1983.

Av tí at løgtingið ikki var saman, varð avtalan gjørd við fyribils góðkenning frá løgtingsins marknaðarnevnd tann 31. december 1982, jbr. løgtingslóg frá 29. mars 1978, §1, seinasta pætti.

Landsstýrið biður við hesum um løgtingsins endaligu góðkenning av avtaluni.

*Sí skjal 7*

1. viðgerð 26. januar 1983. Málið varð viðgjørt saman við málunum nr. 52: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983, nr. 53: Sínámillum fiskiskapur av svartkjafti Føroyar-Ísland í 1983 og nr. 55: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1983. Málini vórðu øll beind í marknaðarnevndina, sum 27. januar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. januar 1983 og undir 1. viðgerð tann 26. (s.m. beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 8. mars 1983 viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan I. Olsen, Jógvan Sundstein og Olaf Olsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Petur Reinert) skilar til:

Hesin sáttmáli við Noreg, ið løgtingið nú — miðjan mars 1983 — skal taka støðu til, kom longu í gildi 1. januar, so her er í veruleikanum einki at taka støðu til. Málið er langt síðan avgjørt.

Sáttmálin var til viðgerðar í marknaðarnevndini 28. og 31. december 1982. Á hesum seinna fundinum góðtók meiriluti nevndarinnar — nevndarlimir samgongunnar — sáttmálan. Á hesum fundi var ásannað, at løgmaður á fundi við norsku samráðingarnevndina í Keypmannahavn 21. december 1982 hevði undirritað sáttmálan treytaleyst, t.e. uttan nakað fyrivarni viðvíkjandi samtykt marknaðarnevndar ella løgtings. Vit vóru tí longu bundnir av sáttmálanum frá tí degi. Minnilutin má tí ásanna, at løgmaður er farin út um tey lógarfyrimæli, ið eru í gildi viðvíkjandi sáttmálagerðum um sínámillum fiskiveiði við onnur lond.

Tann støða, ið tingmenn samgongunnar tóku á marknaðarnevndarfundunum 28. og 31. januar 1983, var tí tann, at teir góðtóku hetta lógloysi løgmans, og tað, sum nú er ætlingin, er, at tingið sjálvt — rættari sagt teir 17 tingmenn samgongunnar — skal leggja vælsignilsi sítt yvir hetta sama lógloysi.

Viðvíkjandi sjálvum innihaldi sáttmálans vísir minnilutin á tær viðmerkingar, ið hann hevði á fyrrnevndu marknaðarnevndarfundum. Tær vóru hesar:

Tjóðveldisflokkurin er ikki ímóti at hava sínámillum sáttmála við Noreg, men metir hendan sáttmála vera ónýtiligan og verri enn teir, ið vit higartil hava havt.

Høvuðsatfinningar minnilutans eru:

1. Tað kann ikki góðtakast, at fiskiveiði okkara við Svalbard verður tikin upp í hendan sáttmála, og at norðmenn avmarka veiði okkara har — bæði viðvíkjandi veiðinøgd og skipatali.
2. Tað kann ikki góðtakast, at vit í hesum sáttmála við Noreg skulu gjalda fyri tey 4.500 tonsini av toski, ið vit longu hava goldið fyri í Sovjetsáttmálanum.
3. Tað kann ikki góðtakast, at útlendsk veiði eftir botnfiski á landleið okkara verður loyvd, meðan hesin botnfiskur er so hart veiddur.

Samanumtikið:

Minnilutin átalar lógloysi løgmansins í hesum máli, átalar at meiri[illegible] hevur góðtikið hetta lógloysi, og átalar teirri

ætlan, sum nú er í gerð, nevniliga at sjálvt løgtingið skal góðtaka hetta sama lógloysið.

Sjálvt innihald sáttmálans er so vánaligt, at minnilutin má mæla tinginum frá at góðtaka hann.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins um skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1983.

Tað var seinast í december mánaði í fjør, tá ið hesin sáttmáli var til viðgerðar í marknaðarnevndini til fyribils góðkenningar, at ført varð fram vegna Javnaðarflokkin, at vit vóru fyri, at ein fiskiveiðusáttmáli átti at fáast í lag við Noreg.

Men kortini ikki fyri ein hvønn kostnað, og víst varð á, at í tí sáttmála, sum landsstýrið hevði samrátt seg fram til og undirskrivað, vóru spurningar av rættiliga »prinsipiellum« slagi, sum Javnaðarflokkurin ikki kundi góðtaka.

Mæltu vit tí til, at landsstýrið átti at taka upp nýggjar samráðingar við Noreg.

Grundin til hesa støðu var hon, at her vóru avtalur drignar inn í fiskiveiðusáttmálan við Noreg, sum ikki hoyrdu við í hesum sáttmála.

Í viðmerkingunum til málið sigur løgmaður, sum hevur lagt málið fyri tingið:

»Sum nakað nýtt umfatar sáttmálin við Noreg føroyska rækjuveiðu við Svalbard. Frá norskari síðu var avtalan treytað av, at føroyska rækjuveiðan við Svalbard varð avmarkað antin við kvotu ella hámarki á veiðuorkuni. Sum lið í sáttmálanum gingu føroyingar við til, at orkan varð avmarkað til 9 skip, har í mesta lagi 5 skip kundu fiska í senn.«

Tað er serstakliga henda avtalan, ið ger, at vit ikki kunnu góðtaka fyriliggjandi sáttmála.

Tað kom eisini týðiliga til kennar í marknaðarnevndini, at heldur ikki allir samgongumenn hildu hesa avgerð landsstýrisins í lagi, men teir tóku kortini undir við sáttmálanum.

Javnaðarflokkurin kann heldur ikki góðtaka, at eingin onnur lodna er við í sáttmálanum uttan norsk.

Fyritreytin frá føroyskari síðu var upprunaliga, at tann parturin, sum ikki varð veiddur í norskari somu, kundi fiskast burtur av felags kvotum — frá russum og norðmonnum alla staðni í Barentshavinum.

Viðvíkjandi rækjuveiðum við Svalbard er at siga, at vit vilja ganga við til avmarkingar, tá ið slíkar gerast neyðugar sambært vísindalig prógv.

Men tá eiga felags avmarkingar at verða gjørdar, t.v.s. ein avtala

ímillum teir, ið veiða rækjur við Svalbard, vísast kann til, at hvørki russar, norðmenn, spaniólar ella bulgarar hava tikið stig til nakra avmarking í rækjuveiðuni við Svalbard.

Javnaðarflokkurin heldur fast við støðu sína um, at hesin sáttmálin ikki eigur at góðtakast í tí líki, hann nú hevur.

Vit eiga at siga norðmonnum frá, at Føroya Løgting ikki kundi góðtaka fiskiveiðusáttmálan, uttan so at avtalan um rækjur og lodnu við Svalbard verður broytt.

Út frá hesum viðmerkingunum setir minnilutin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp nýggjar samráðingar við Noreg um ein nýggjan fiskiveiðusáttmála.

2. viðgerð 18. mars. Málið varð aftur beint í marknaðarnevndina, sum 23. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. januar 1983 og undir 1. viðgerð tann 26. s.m. beint í marknaðarnevndina. Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur lagt álit fram, men undir 2. viðgerð 18. mars varð málið aftur beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur aftur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Jørgen Thomsen, Jógvan I. Olsen) vísir til støðu sína í fyrra áliti.

Minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) helt, at um semja fekst í marknaðarnevndina um at átala, at løgmaður uttan fyrivarni viðvíkjandi samtykt marknaðarnevndarinnar og løgtings hevur undirskrivað henda sáttmála, og at vissa er fyri, at slíkt ikki hendir aftur, kundi hann umhugsa at góðtaka henda sáttmála, um vissa fekst fyri, at sáttmálin verður broyttur við næsta samráðingarumfar, sum má fáast í lag skjótast gjørligt.

Av tí at undirtøka ikki fekst í nevndini fyri hesum, má hesin minniluti halda seg til upprunaligu støðu sína í hesum máli.

Framhaldandi 2. viðgerð 24. mars, atkvøðugreiðsla á seinri fundi sama dag. Uppskot landsstýrisins samtykt við 20-4, uppskot frá minniluta (Jørgen Thomsen) fall við 15-0.

F.L.j.nr. 1500-4-2

---

# 52. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983

Ár 1983, mikudagin 19. januar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 8. december 1982 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983.

**Viðmerkingar:**

Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvør øðrum.

Samráðingarnar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1983 vóru í Tórshavn 6.-8. december 1982, og samdust partarnir um viðløgdu skipan sambært skjal 1.

Sambært avtaluni fáa føroysk skip loyvi til í sovjetiskum sjógvi at veiða 15.500 tons av toski, íroknað hjáveiðu av hýsu og øðrum botn

fiski. Av hesum kunnu 11.000 tons veiðast í Barentshavinum. Fyri fyrstu ferð kann øll henda kvotan veiðast í sovjetiska-norska felagsøkinum, tí sonevnda »blandaða« ella »gráa økinum« ella í teimum pørtunum av Barentshavinum, sum liggja út fyri sovjetisku strondini, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar. 4.500 tons av kvotuni kunnu tó veiðast í norska partinum av Barentshavinum, treytað av góðkenning frá norsku myndugleikunum, sum er fingin sambært løgtingsmál nr. 51/1982: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Í Eystarasalti, í teimum pørtunum, ið liggja út fyri sovjetisku strondini, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar, verður loyvt at veiða 4.500 tons av toski, íroknað hjáveiðu av øðrum botnfiski.

Føroysk skip kunnu harnæst veiða 20.000 tons av lodnu í Barentshavinum.

Afturfyri verður loyvt russiskum skipum at veiða í sjóøki Føroya 100.000 tons av svartkjafti til matna.

Frá sovjetiskari síðu verður eingin avmarking ásett fyri talið av føroyskum fiskiførum.

Frá føroyskari síðu verður talið av sovjetiskum fiskiførum í svartkjaftaveiðuni avmarkað til 14 í tíðarskeiðinum januar-september og 10 í tíðarskeiðinum oktober-december.

Partarnir samdust um í 1983 at halda fram við sínámillum royndarfiskiskapinum. Føroyskum skipum verður loyvt at reka royndarfiskiskap eftir rækjum í teimum pørtunum av Barentshavinum, ið liggja út fyri sovjetisku strondini, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar.

3 sovjetisk skip kunnu samstundis fáa loyvi at gera royndarfiskiskap í føroyskum sjógvi, djypri enn 700 m. Loyvt verður einum av fyrrnevndu 3 skipum at reka djúphavsroyndarfiskiskap íroknað dýpið millum 500 og 700 metrar rundan um Ytra Bailey Banka, tó so at samlaða veiðan av botnfiski hægst skal vera 200 tons.

Royndarfiskiskapur skal fremjast sambært fiskiætlanum, sum partarnir skulu siga hvør øðrum frá frammanundan.

Áhugi var fyri nærri vísindaligum samstarvi og í hesum sambandi luttøku í millumlanda samstarvi viðvíkjandi svartkjafti.

Loyvi verður 1-2 sovjetiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli og høgguslokki á føroyskum sjóøki á teimum leiðum, har sovjetisk skip hava loyvi at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða veiðan av hvørjum av hesum sløgum má ikki fara upp um 2.000 tons.

Fyri allan royndarfiskiskapin á føroyskum øki er galdandi, at føroyingar kunnu seta sínar serfrøðingar umborð á sovjetisku skipini.

*Sí skjal 8*

1. viðgerð 26. januar 1983. Málið varð viðgjørt saman við málunum nr. 51: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1983, nr. 53: Sínámillum fiskiskapur av svartkjafti Føroyar-Ísland í 1983 og nr. 55: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1983. Málini vórðu øll beind í marknaðarnevndina, sum 27. janaur legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. januar 1983 og undir 1. viðgerð 26. í s.m. beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Svend Åge Ellefsen, Jógvan Sundstein, Jørgen Thomsen og Agnar Nielsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) tekur støðu í tingsalinum.

27. januar varð loyvi givið at frávíkja tíðarfreistina til 2. viðgerð av málinum. Uppskotið varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

*F.L.j.nr. 1500-1-11-2*

# 53. Sínámillum fiskiskapur av svartkjafti Føroyar-Ísland í 1983

Ár 1983, mikudagin 19. januar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 30. december 1982 millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskiskap av svartkjafti í 1983.

**Viðmerkingar:**

Samband hevur verið ímillum umboð fyri Føroya landsstýri og umboð fyri íslendsku stjórnina um framhald av sínámillum fiskiskapi av svartkjafti í 1983.

Partarnir eru samdir um eina skipan fyri 1983, sum er váttað við telexum og brøvum frá báðum pørtum, dagfest ávikavist 29. og 30. december 1982, sambært skjølini 1 og 2.

Sambært hesi skipan kunnu íslendingar og føroyingar fáa loyvi til at veiða upp til 30.000 tons av svartkjafti á fiskiøkinum hjá hvør øðrum. Loyvini umfata eisini skip, ið viðgera veiðuna umborð.

Partarnir eru eisini samdir í, at nærri skipanir um svartkjaftaveiðuna verða avtalaðar beinleiðis millum føroyskar og íslendskar fiskimyndugleikar, og at reglurnar um sínámillum fiskirættindi sambært avtaluni frá 10. januar 1979 um fráboðanarskyldu v.m. annars verða fylgdar.

Leggjast kann aftrat, at avtalan um føroyska botnfiskiveiðu við Ísland heldur fram, inntil annar av pørtunum ynskir hana uppsagda ella broytta við 6 mánaða ávaring.

Av tí at løgtingið ikki var saman, varð avtalan gjørd við fyribils góðkenning frá løgtingsins marknaðarnevnd tann 31. december 1982, jbr. løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978, § 1, seinasta petti.

Landsstýrið biður við hesum um løgtingsins endaligu góðkenning av avtaluni.

*Skjal 1*

Utanríkisráðuneytið
Hverfisgötu 115 - Reykjavík
29. desember 1982

Hr. løgmaður,
Eg leyfi mér að bera fram tilløgu þess efnos að veittar verði gagnkvæmar heimildir til veiða á 30 þúsund lestum af kolmunna innan fiskveiðiløgsøgu Færeyja og efnahagsløgsøgu Íslands á árinu 1983. Heimilt er ennfremur að vinna aflann um borð í skipum þeim er leyfi fá til veiðanna. Um nánara fyrirkomulag þessara veiða verður haft beint samband milli íslenska sjávarútvegsráðuneytisins og landsstjórnar Færeyja. Að øðru leyti mun fylgt því fyrirkomulagi og reglum sem ákveðið var í niðurstøðum viðræðna um gagnkvæmar fiskveiðiheimildir Íslendinga og Færeyinga sem undirritaðar voru 10. janúar 1979.

Ef þer fallist á ofangreint, hr. løgmaður, bið ég um staðfestingu yðar þar að lútandi.

*Ólafur Jóhannesson*

*Skjal 2*
F.L.j.nr. 1500-2-4-3

Tórshavn, 30.12.1982

Harra Ólafur Jóhannesson, uttanríkismálaráðharri,
Uttanríkisráðuneytið,
Hverfisgøtu 113,
Reykjavík.

Víst verður til bræv tygara frá í gjár, har ið skotið verður upp, at íslendingar og føroyingar í 1983 fáa loyvi til at veiða upp til 30.000 tons av svartkjafti á fiskiøkinum hjá hvørjum øðrum í 1983, og at hetta eisini umfatar skip, ið veiða svartkjaft og viðgera hann umborð.

Vegna Føroya Landsstýri kann eg svara, at vit eisini yniskja eina slíka skipan, og at vit eru samdir í, at nærri fysiskipanir um hesa veiðu eiga at verða avtalaðar beinleiðis millum føroyskar og íslendskar fiskimyndugleikar, og at tær reglur, ið avtalaðar vóru í samrøðum um

sínámillum fiskiveiðirættindi føroyinga og íslendinga millum 10. januar 1979 annars verða fylgdar.

L.v.
Pauli Ellefsen,
løgmaður

1. viðgerð 26. januar 1983. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmálunum nr. 51: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1983, nr. 52: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983 og nr. 55: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1983. Málini vórðu øll beind í marknaðarnevndina, sum 16. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. januar 1983 og undir 1. viðgerð 26. í s.m. beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt.

2. viðgerð. Uppskot landsstýrisins samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-2-4-3

# 54. Fiskivinna á Føroya-leiðini

Ár 1983, mikudagin 19. januar legði Hans M. Joensen, løgtingmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um fiskivinnu á Føroyaleiðini**

**§1.** Meginreglan í fiskivinnupolitikkinum er, at vit røkja og nýta fiskarríkidømi á egnum fiskiøki á slíkan hátt, at hetta ríkidømið verður varðveitt og umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum, at royndirnar verða ikki størri, enn fiskastovnarnir tola, at teir fiskastovnar, ið eru ovveiddir, verða upp aftur bygdir, at stødd og samanseting veiðiflotans verður lagað eftir hesum møguleikum, og at eingin útlendsk veiði eftir botnfiski verður loyvd.

**§2.** Trolveiði eftir botnfiski við førum, ið antin einsæris ella í partroling samanlagt hava størri maskinorku enn 1000 hk, er bert loyvd uttan fyri fjórðingar úr grundlinjunum.

*2. stk.* Onnur trolveiði eftir botnfiski er bert loyvd uttan fyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum.

*3. stk.* Tó er trolveiði loyvd innan fyri 12 fjórðingar eftir flatfiski til ávísar tíðir, á ávísum leiðum, við ávísum troli og við ávísum skipatali, ið fiskirannsóknarstovan tilskilar, og undir leiðslu hennara. Hjáveiði í hesi troling av toski og hýsu má ikki fara upp um 25% av allari vektini.

§3. Økið norðanfyri — úr rættvísandi norðan úr Mýlingi í rættvísandi norðau úr Norðbergi á Fugloynni — verður friðað fyri trol- og garnaveiði alt árið í 3 ár frá 15. februar 1983.
*2. stk.* Økið vestan fyri Sandoynna, sum nú er friðað í tíðarskeiðinum frá 1. aprfl til 30. aprfl, verður friðað frá 1. mars til 30. mai hvørt ár í 3 fylgjandi ár.
*3. stk.* Føroya Banki verður friðaður fyri trolveiði alt árið.

§4. Minst loyvda meskavídd á troli er 155 mm. Fiskirannsóknarstovan kann tó geva undantaksloyvi til minni meskavídd til troling eftir ávísum fiskasløgum og til royndarfiskiskap við føroyskum skipum.

§5. Útlendsk veiði eftir botnfiski er ikki loyvd.

**Um veiðiflotan**

**§6.** Innflutningsloyvi og stuðulslán/veðhald verða — hagar til tilmæli um slíkt er komið frá fiskivinnuráðnum — ikki veitt til fiskifør til botnfiskaveiði.

**§7.** Eftir tilmælum frá fiskivinnuráðnum og eftir reglugerð, sum landsstýrið saman við fíggjarnevnd løgtingsins setir, verður landsstýrinum veitt heimild til at veita stuðul til fiskifør, sum leggja um frá botnfiskaveiði til aðra veiði.

**§8.** Eftir tilmælum frá fiskivinnuráðnum verður stýrinum fyri lønjavningargrunninum álagt at sýta fyri studningum til før, ið fiskivinnuráðið metir vera óegnað til fiskivinnu. Verða slík før løgd ella heilt tikin úr veiðiflotanum, tekur landsstýrið saman við fíggjarnevndini avgerð um, um eigarin og manning skulu hava endurgjald, og tá hvussu mikið. Peningurin verður at gjalda úr landskassanum.

**Viðmerkingar:**

Hin 22. november í fjør kemur nýggjasta tilmælið frá fiskivinnuráðnum um botnfiskaveiði okkara á Føroyaleiðini, og sum fylgiskjal til hetta eru uppafturtiknar tær metingar um fiskastovnarnar, sum fiskirannsóknarstovan hevur ført fram á hvørjum ári í seinastuni.

Tingmenn tjóðveldisfloksins fingu ikki hesi tilmæli fyrr enn 8. januar í ár, men mettu vit, at her mátti farast til verka beinanvegin.

Flokkurin setir tí hetta uppskot fram um fiskivinnu á Føroyaleiðini, og hevur flokkurin í flest øllum førum gjørt uppskotið í tráð við tilmæli fiskivinnuráðsins. Tjóðveldisflokkurin metir hetta uppskot sum eitt samráðingaruppskot, t.e. uppskot, ið hann ynskir samráðingar

um við allar aðrar flokkar á tingi. Vit hava tí latið spurningin um, hvussu stórir ella kraftamiklir trolarar eiga at verða fyri bert at fáa loyvi at fiska á djúpum vatni, og eisini hvussu mangar fjórðingar úr landi, teir eiga at fiska, standa opnan til samráðingar við aðrar flokkar.

Flokkurin leggur harnæst áherðslu á, at løgtingið (fiskivinnunevndin) í viðgerð síni av uppskotinum hevur neyvar samráðingar við fiski- og útróðrarmenn og við skipa- og bátaeigarar, áðrenn nøkur avgerð verður tikin í hesum málum.

1. viðgerð 1. februar 1983. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 19. januar í ár og við 1. viðgerð 1. februar beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur Dam Jacobsen, Olaf Olsen, Jógvan I. Olsen, Frederik Olsen, Juul Jacobsen og Tórálvur Mohr Olsen) vísir á løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 við seinri broytingum um fiskiveiði á landleiðini, har §4, 1. stk. sigur: »At skipa fyri fiskiskapinum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, er landsstýrinum saman við løgtingsins fiskivinnunevnd, heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, tað er reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskiháttir, avmarking av veiðinøgd, avmarking av veiðiorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk.«

Við hesi lóg hevur Føroya løgting lagt hetta málsøkið til landsstýrið og løgtingsins fiskivinnunevnd at umsita, og setir meirilutin sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Hans Marius Joensen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 6. mai. Uppskotið frá Tjóðveldisflokkinum §1 fall við 8-0 atkvøðum.

# 55. Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1983

Ár 1983, mikudagin 26. januar legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagf. 13. januar 1983, um sínámillum fiskirættindi í 1983 millum Føroyar og EEC.

**Viðmerkingar:**
**1.** 15. og 16. december 1982 hava samráðingar verið í Bruxelles millum umboð fyri landsstýrið og EEC-nevndina um sínámillum fiskirættindi í 1983 millum Føroyar og EEC. Úrslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, undirritað í Brüssel 13. januar 1983.
**2.** Loyvda talið á EEC-fiskiskipum at veiða á landleiðini er ikki endaliga ásett enn, men skulu samráðingar verða um hetta spurning.
**3.** Loyvdu veiðinøgdirnar í 1983 av ósløgdum fiski eru hesar:

*Hjá EEC-skipum á landleiðini:*
**Samlaða nøgdin av svartkjafti, makreli og botnfiski verður í 1983:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1.100 | tons | av | toski |
| 1.100 | - | - | hýsu |
| 3.500 | - | - | upsa |
| 4.800 | - | - | kongafiski |
| 4.500 | - | - | blálongu |
| 500 | - | - | longu |
| 400 | - | - | brosmu |
| 300 | - | - | flatfiski |
| 500 | - | - | ymiskum fiskasløgum |
| 25.000 | - | - | svartkjafti |
| 3.500 | - | - | makreli |

*Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:*

(a) 500 tons av longu og 500 tons av brosmu á Rock All-leiðini. Eisini er loyvt at veiða 750 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í fdnaðarfiskiskapi; í 1982 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 700 tons av blálongu á havleiðunum vestan fyri Skotland (í 1982: 400 tons).

(b) 10.000 tons av tí vestara makrelstovninum; í 1982 vóru nøgdirnar tær somu. Um fiskiskapur á eystara makrelstovninum verður loyvdur í 1983, skulu tingingar fara fram millum partarnar.

(c) 6.000 tons av rossamakreli, sama nøgd sum í 1982.

(d) 15.000 tons av hvítingsbróður, 15.000 tons av nebbasild og 15.000 tons av brislingi; 1982-tølini vóru ávikavist 20.000 tons, 15.000 tons og 15.000 tons. Fiskast kunnu tó eyka 5.000 tons av hvítingsbróður og nebbasild, treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður, nebbasild og brisling ikki fer uppum 45.000 tons (í 1982 50.000 tons).

(e) 1.800 tons av sild vestan fyri Skotland (sama nøgd í 1982).

(f) 30.000 tons av svartkjafti (í 1982 25.000 tons).

(g) 500 tons av sild í Skagerak; 1982-talið var 600 tons.

(h) 475 tons av rækjum í Vesturgrønlar li í NAFO-øki 1 (í 1982 500 tons). 675 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1982 700 tons).

(i) 150 tons av svartkalva undir Vesturg. - la ıdi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1982 sama nøgd.

(j) 300 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3Ps (St. Pierre og Miquelon).

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi) (í 1982: 600 tons).

(l) Loyvt er í 1972 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturland, um EEC loyvir sínum bátum at veiða av stovninum.

**4.** Føroyingar hava, eins og undanfarin ár, tryggjað sær, at samráðingar skulu takast upp um áseting av toskakvotu til føroyingar í Grønlandi, um so er at aðrir enn grønlendingar fáa loyvi at fiska tósk í Grønlandi. Somuleiðis er møguligt at krevja samráðingar, um sildarveiða í Norðsjónum aftur verður loyvd.

**5.** EEC hevur eins og í fjør undir samráðingunum um sínámillum fiskiveiðu fyri 1983 sett sum treyt fyri eini avtalu, at føroyingar átóku sær at avmarka laksaveiðuna, vísandi til, at ein munandi partur av tí laksi, ið verður fiskaður við Føroyar, stavar frá áum í EEC-londum, og at laksasáttmálin óivað ikki kom í gildi í 1983.

Av hesi orsøk hava føroyingar gingið við til í serligum brævaskifti at vátta, at vit vilja avmarka laksaveiðu okkara til 625 tons í 1983/84 (tíðarskeiðið 1. oktober 1983 - 31. mai 1984).

*Sí skjal 9*

Loyvi varð givið til frávik í tíðarfreistini á seinni fundi sama dag at viðgera málið. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmálunum nr. 51: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1983, nr. 52: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983 og nr. 53: Sínámillum fiskiskapur av svartkjafti Føroyar Ísland í 1983. Málini vórðu øll beind í marknaðarnevndina, sum 27. januar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. januar 1983 og undir 1. viðgerð sama dag beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Svend Åge Ellefsen og Jógvan I. Olsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Hilmar Kass, Jógvan Sundstein og Svend Åge Ellefsen harmast um, at tað var neyðugt fyri at fáa sáttmálan í lag at loyva útlendingum við 10 skipum at nýta trol við meskum niður í 120 mm í veiðu eftir upsa

uttan fyri 21 fjórðingar, og heita á landsstýrið um at hava hetta í huga, tá ið samráðingarnar um fiskisáttmálan 1984 fara fram.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Petur Reinert) førir fram:

Í 1977 varð undirskrivaður sokallaður rammusáttmáli millum Føroya og EEC-landanna. Hesin sáttmáli bar í sær, at á hvørjum ári skuldu vera samráðingar millum partar, fyri at ávís fiskivinna skuldi verða hjá báðum pørtum inni á økjum hjá hvørjum øðrum.

Dentur varð lagdur á, at Føroyar sum í mun til tey lond, ið sáttmáli var gjørdur við, skuldi duva á fiskivinnu burturav, átti at fáa eina ávísa yvirvág, tá býtast skuldi. Samstundis skuldi ríkisfelagsskapur okkara við Danmark ikki verða okkum til bága, heldur til fyrimunar.

Vit hava síðan við større og minni hepni fingið slíkar árssáttmálar við EEC, sjálvt um til tíðir eingir slíkir sáttmálar hava verið. Tað eydnaðist okkum fyrstu árini at gera slíkar avmarkingar í botnfiskiveiði EEC-skipananna, sum neyðugar vóru fyri stovnsvarðveiting av botnfiskinum, og samstundis hepnaðist okkum við tiltøkum mótvegis nógvum lógbrotum at gera EEC-londunum greitt, at skuldu tey hugsa um fiskiveiði á føroysku landleiðini, máttu tey halda føroyskar lógir. Større og fleiri økir vórðu avstongd fyri útlendskari veiði, og hin vegin eydnaðist okkum at fáa brúkiligar fiskimøguleikar á teirra leiðum. Men seinastu árini — ella síðan hetta landsstýrið tók við — er vent í holuni. Fiskimøguleikar okkara í EEC-sjógvi er fyri ein stóran part fyri pappírsfisk at rokna, og tað, sum fiskast kann í donskum ríkissjógvi, er fyri einki at rokna. Lyftið, sum er givið í §4 í hesum sáttmálauppskoti um toskakvotur í Grønlandi, er einki uttan ber táta, men tað, sum verri er, er, at landsstýrið nú alt meira fyri hvørt ár, sum gongur, hevur givið større og større lóggávuvald á føroysku landleiðini til EEC-landanna í Brüssel; fyrra árið longda veiðitíð á Føroya Banka og snørdar trolposar og í fjør harradømi yvir okkara laksaveiði í føroyskum sjógvi. Í ár ber av. Nú bjóðar landsstýrið EEC-skipum beinleiðis lógarbrot á føroyskum fiskiveiðireglum, soleiðis at EEC-skip skulu sleppa at reka fiskiveiði við ólógligum reiðskapi, sum føroysk skip høvdu verið revsað fyri (100 og 120 mm meskavídd á troli).

Tjóðveldisflokkurin kann tí undir ongum umstøðum taka undir við hesum sáttmála, men mælir tinginum til at atkvøða ímóti og vil samstundis mæla tinginum til at heita á landsstýrið at gera EEC púra greitt, at við hesum sáttmálauppskoti og teirri uppílegging í innanhýsis føroysk viðurskifti, sum hetta sáttmálauppskot vísir, hevur EEC brotið rammusáttmálan frá 1977, og sum tí má roknast at vera farin úr gildi.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) er av teirri áskoðan, at vit eiga at hava fiskivinnusáttmálar við onnur lond, har tað er gjørligt, men ásannar, at úrslitið av samráðingunum við EF hesa ferð er munin verri, enn tað var seinasta ár.

Minnilutin metir, at politikkur samgongunnar í viðurskiftum okkara mótvegis EF er alt ov veikur og undirbráttligur.

Tað kann ikki góðtakast, at vit á hvørjum ári skulu geva EF eyka sømdir á okkara sjóøki, sum t.d. at loyva EF trolarum at veiða við smærri trolmeskum, enn okkara egnu trolarar hava loyvi at nýta.

Heldur ikki kann tað góðtakast, at EF skal avgera, hvussu stórar nøgdir av laksi kunnu veiðast á okkara egna sjóøki.

Javnaðarflokkurin er av teirri áskoðan, at spurningurin viðvíkjandi laksinum á okkara sjóøki skal loysast við samráðingum á altjóða stigi.

Soleiðis sum vit fyrr hava víst á, so er okkara áskoðan, at vit eiga at vera við at loysa laksafiskiskapin í eini altjóða laksakouventión, heldur enn at loyva EF at lóggeva inni á okkara sjóøki, soleiðis sum fyriliggjandi sáttmáli gevur EF møguleika til.

Javnaðarflokkurin metir, at gongdin í sáttmálasamráðingunum við EF, ið sitandi samgonga hevur ført, meiri hevur verið til fyrimunar fyri áður nevnda felagsskap enn fyri okkum føroyingar.

Út frá hesum kann flokkurin ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti, men setir einki uppskot fram.

Á hesum fundi 27. januar varð loyvi givið at hava 2. viðgerð av málinum aftan á fundarslit. Uppskotið varð samtykt við 17 ja-atkvøðum, 7 atkvøddu nei, 7 atkvøddu ikki, ein var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Oisen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu: Tordur Niclasen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen.

Atkvøddu ikki: Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam.

Burturstaddur: Petur Reinert.

F.L.j.nr. 1198-2-72

# 56. Samskipan av heilsu- og sosialverki

Ár 1983, mikudagin 26. januar legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum sum skjótast og í seinasta lagi um 3 mánaðir at gera reglugerð um eina ráðleggingarnevnd fyri samskipan av sosial- og heilsuverkinum, so tey í størri mun verða tillagað føroyskum viðurskiftum. Nevndin skal verða sett í seinasta lagi um eitt hálvt ár.

**Viðmerkingar:**

Sosial- og heilsuverkið eru ógvuliga týðandi øki í samfelag okkara. At sosialverkið virkar øllum teimum frægast til gagns, ið tørv hava á ti, má vera eitt hitt mest týðandi samfelagsmál hjá okkum í dag, menniskjansliga eins væl og fíggjarliga. Sosialverkið í Føroyum kostaði landi og kommunum tilsamans 169,490 mill. kr. fíggjarárið 1980/81. Hetta var tað sama sum 15,5% av samlaðu almennu útreiðslunum, aftrat hesum skulu so leggjast 148,540 mill.kr., ið danski staturin lækt til sosialverkið í Føroyum sama tíðarskeið. Kommunurnar 21,236 mill.kr. og annað 31,693 mill.kr.

Tað má tí haldast at vera av avgerandi týdningi, at so góð vissa fæst sum gjørligt fyri, at hesin peningur verður nýttur á rættan hátt, soleiðis at skilja, at tey, ið tørva, fáa mest møguligt gagn av teimum veitingum, ið latnar verða.

Í løtuni tykist rættiliga stór óvissa at vera um, hvørt sosialverk okkara virkar so væl, sum tað átti. Somuleiðis eru mong ivamál, tá talan er um, hvussu framtíðarætlanirnar sosialverki okkara viðvíkjandi skulu leggjast í tryggar, skynsamar karmar, ið best hóska til samfelag okkara. Her verður m.a. hugsað um ivamál viðvíkjandi byggjan av ellisheimum, endurbúgving og annað mangt, ið tvídráttur hevur staðist av seinastu árini.

Eftir okkara tykki gerst tað alsamt meira neyðugt at fáa fram eina reiðiliga samskipaða ráðlegging innan sosialverk okkara við serligum atliti til, hvussu tað á besta hátt kann fáast í haldgóða legu og í samljóð við samfelag okkara komandi árini. Dentur eigur at verða lagdur á at fáa skipað sosialverkið eftir egnum fortreytum okkara, sum á mangan hátt eru ólíkar teimum, ið meginparturin av sosialverki okkara í dag er grundaður á, bygt sum tað er fyrst og fremst á lóggávu, sum í uppruna sínum er donsk.

Vit ivast ikki í, at ein miðvís ráðlegging innan hetta øki við føroyska samfelagnum sum grundarlag í stóran mun kemur at bøta um sosialverk okkara, so meira gagn fæst úr tí, bæði úr einum sosialum og fíggjarligum sjónarmiði.

Nær tengt upp í sosialverkið er heilsuverkið. Heilsuverkið kostaði landinum 55,4 mill. kr. Hetta var tað sama sum 7,3% av samlaðu løgtingsfíggjarlógini 1981/82. Aftrat hesum skulu so leggjast 72,1 mill. kr., ið danski staturin lætt til heilsuverkið í Føroyum sama tíðarskeiðið. Kommunurn[illegible] lótu harumframt 8,4 mill. kr. og sjúkrakassarnir 17,2 mill. kr.

Í løtuni verða sosialverkið og heilsuverkið í ógvuliga stóran mun umsitin hvørt fyri seg, soleiðis at tólk innan annað øki lítaa eg eru serkunnleika nava til hitt.

Hetta [illegible] vit, er ógvuliga óheppið [illegible] tað eru mong øki, har heilsuligir og sosialir spurningar eru nær samanvivnaðir. Sum bøkur fá dømi kunnu nevnast: *a)* røkt av gomlum, brekaðum ella sjúkum heima við heimahjálparum og/ella heimasjúkrasystrum, *b)* byggingin av ellisheimum og røktarheimum, har ofta tað heilsuliga í royndi og veru hevur mest at siga. Kortini hoyra ellis- og røktarheim sum oftast ikki undir heilsuverkið, men sosialverkið og *c)* endurbúgving. Hetta øki verður umsitið av sosialverkinum, hóast tað má metast at vera eins nógv eitt heilsumál sum sosialmál.

Vit hava sum er eina ráðleggingarnevnd fyri sjúkrahúsverkið og eina fyri apoteksverkið. Heilsuverkið fevnir tó um annað og meira enn hesi øki. Vit kunnu nevna kommunulæknarnar, skúlalæknar, tannlæknar, heilsusystrar, heimasjúkrasystrar o.s.fr.

Fyrimunirnir við at seta eina ráðleggingarnevnd, sum skotið er upp, eru eftir okkara tykki, at arbeiði nevndarinnar fer at geva okkum betri møguleikar at meta um, hvør kósin er hin rætta at halda innan føroyska sosial- og heilsuverkið í árunum, sum koma.

Flokkurin heldur, at gjørd eigur at verða ein reglugerð til ráðleggingarnevnd fyri samskipan og umskipan av sosial- og heilsuverkinum í Føroyum. Sum limir í slíkari nevnd áttu at sitið: almannastjórin, landslæknin, sjúkrahússtjórin, komandi endurbúgvingarstjórin, leiðarin fyri heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini og leiðarin á heimahjálpini. Hetta nevndararbeiði skal vera óløgt.

Onkur vil óivað halda, at nóg mikið er av nevndum í landi okkara sum er. Rætt er, at nógvar nevndir eru, kanska ov nógvar, men sosial- og heilsuverkið hevur ein so stóran samfelagsligan/fíggjarligan týdning, at tað má sigast at vera óráð í longdini ikki at hava reiðiligar fyritreytir fyri føstum samskipaðum stýringsmøguleika fyri hesi bæði økini.

Mong dømi kundu verið nevnd um óhepnar, dýrar og skeivar loysnir bæði innan sosial- og heilsuverkið, ið ikki høvdu verið framdar, hevði ráðleggingin verið dygdarbetri.

Lat okkum tí sum skjótast bøta um hetta. Ein fyritreytin er, at ein skynsom ráðleggingarnevnd verður sett.

1. viðgerð 1. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 6. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av Tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 1. februar 1983 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið til samtyktar snýr seg um at áleggja landsstýrinum at seta eina ráðleggingarnevnd fyri samskipan av sosial- og heilsuverkinum, so tey í størri mun verða tillagað føroyskum viðurskiftum.

Av viðmerkingunum framgongur, at mest er hugsað um sosialu tænastuna og sokallaðu primeru heilsutænastuna so sum kommunulæknar, heilsusjúkrasystrar, skúlalæknar, tannlæknar v.m. Víst verð-

ur eisini á, at fyri sjálvt sjúkrahúsverkið og fyri apoteksverkið eru settar serstakar ráðleggingarnevndir.

Í viðmerkingunum er eisini nevnt, hvørjir persónar ella umboð, sum kunnu hugsast at manna eina slíka ráðleggingarnevnd.

Spurningar viðvíkjandi sosial- og heilsuverkinum hava mangan áður verið viðgjørdir á tingi og verða tað eisini mangan í framtíðini. Til dømis hevur spurningurin um at býta sosialu fyrisitingina upp í fleiri eindir fyri landið verið frammi fyri nøkrum árum síðani. Fyri tann einstaka, sum hevur heilsu- ella sosialverkið fyri neyðini, hevur tað alstóran týdning, at hann fær ta røttu málsviðgerðina.

Nevndin er samd um, at mangt eigur at vera øðrvísi á hesum øki, bæði viðvíkjandi sjálvari fyrisitingini av sosial- og heilsuverkinum og viðvíkjandi upplýsingartænastuni á økinum. Milluin annað kunnu sosialar nevndir og fyrisitingar setast fyri partar av landinum t.d. hvørja sýslu. Nevndin heldur kortini ikki, at tað eigur at vera álagt landsstýrinum frammanundan, hvørjir persónar ella umboð skulu mynda eina ráðleggingarnevnd, men at tað skulu vera køn fólk.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Karin Kjølbro, Jóannes Dalsgaard) setir fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um sum skjótast at seta eina ráðleggingarnevnd fyri samskipan og umskipan av sosial- og heilsuverkinum, soleiðis at verkini betur tæna einstøku borgarunum og annars í størri mun verða tillagað føroyskum viðurskiftum. Landsstýrið ger reglugerð fyri nevndina.

Minnilutin (Frederik Olsen og Eli Nolsøe) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 9. mai. Atkvøðugreiðsla 10. mai. Uppskotið til samtyktar frá meiriluta í sosialu nevndini samtykt við 17-0 atkvøðum.

# 57. Partapeningur í felag til keyp av millumlanda ferðamannaskipi

Ár 1983, hósdagin 3. februar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um tekning av partapeningi í og veitan av veðhaldi til felag við endamáli at keypa og umbyggja ferðamannaskip til millumlanda sigling.**

**§ 1.** Landsstýrið saman við fíggjarnevndini verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 20% av partapeninginum í felag til keyp og umbygging av ferðamannaskipinum »Gustav Vasa« til millumlanda sigling og at læna neyðugan pening til hetta endamál.

*2. stk.* Landsstýrið saman við fíggjarnevndini verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri prioritetslánum til nevnda skipakeyp og umbygging upp til 15% av fleggingini eftir meting.

**lagtingslov om tegning af aktiekapital i samt ydelse af garanti til selskab med det formål at købe og ombygge passagerskib til udenrigsfart.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne at tegne op til 20% af aktiekapitalen i selskab med det formål at indkøbe og ombygge passagerskibet »Gustav Vasa« til udenrigsfart og til at låne nødvendig kapital til dette formål.

*Stk. 2.* Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for prioritetslån til nævnte skibskøb og ombygning op til 15% af investeringen i henhold til vurdering.

*3. stk.* Lánið, landskassin veðheldur fyri, skal tryggjast við pantirætti í viðkomandi skipi innan fyri 90% av virðinum.

*Stk. 3.* Det lån, landskassen garanterer for, skal sikres med panteret i vedkommende skib indenfor 90% af værdien.

§2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Síðani 1975 hevur »Smyril« røkt ferðamannasiglingina millum Føroyar og útheimin á sumri. Tey fyrstu árini øktist ferðafólkatalið ár um ár, men í 1982 minkar talið nakað í mun til 1981. Strandferðslan hevur upplýst, at bíleggingarnar í ár upp á seg eru størri enn frammanundan.

Uttanlandssiglingin hevur útvegað umleið 50 eyka arbeiðspláss, teir mánaðirnar hon hevur vart.

Sum tíðin er farin, er »Smyril« orðin eldri og minni nútímans til ferðamannasigling millum lond. Hann uppfyllir tí ikki krøvini longur til nútímans sigling, eins og hann ikki hevur rúmd fyri tí ferðafólkatali, sum eina ávísa tíð av sumrinum ynskir at ferðast við hesi rutu

Sitandi samgonga hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at flyta millumlanda siglingina hjá strandferðsluni yvir í privat partafelag.

Fyriliggjandi lógaruppskot er ein liður í hesi samskipan. Tað snýr seg um at geva landsstýrinum heimild at seta upp til 20% av partapeninginum í eitt slíkt felag og at veita landsstýrinum tilsvarandi lánsheimild. Samlaði partapeningurin kann ætlast til umleið 12 milj. kr., og verður landskassans partur so statt umleið 2,4 milj. kr. Umhugsað verður at keypa skip fyri umleið 100 milj. kr. og at umbyggja hetta fyri umleið 20 milj. kr.

Felagið hevur samrátt seg fram til ein keypspris upp á US-dollars 11.500.000, og sum nevnt verður roknað við, at umbyggingin kostar umleið 20 milj. kr.

Eisini inniheldur lógaruppskotið heimild til landsstýrið at veðhalda fyri upp til 15% av útveganarvirðinum, herundir umbygging.

Ætlanin er — og tað er eisini ein fyritreyt frá landsstýrisins síðu — at skipið bert skal sigla upp á Føroyar um summarið. Hinvegin meta menn, sum hava kannað málið, at góðir møguleikar eru fyri at leiga skipið út ein ávísan part av restini av árinum.

Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at »Teistin« er leigaður út til Trinidad, væntandi fyri eitt longri tíðarskeið, undir góðum figgjarligum treytum fyri strandfaraskip landsins.

Hetta skip vil útvega útivið 100 arbeiðspláss í mun til tey 50 framanundan.

Viðløgd eru fylgjandi skjøl:
1. Teknisk høvuðsspecifikatión
2. Høvuðstekning (A4 format)
3. Fotoavrit av myndum av skipinum
4. Yvirlit yvir umbyggingina av skipinum
5. Rakstrar- og likviditetsætlan

*Sí skjølini 10A-F*

Loyvi varð givið við atkvøðugreiðslu við 20-0 atkvøðum at frávíkja tíðarfreistina til 1. viðgerð av málinum á seinni fundi sama dag. Málið varð eftir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina, sum 4. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. februar 1983 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 4. í s.m. viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og triggjar minniluti.

Treytað av, at eginpeningur felagsins verður 10% av samlaðu íløguni upp á 120 mió. kr., tekur meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) uttan viðmerkingar undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og hevur hesar viðmerkingar:

Tað harmar Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk, at landsstýrið fyrst álíknar samfelagsborgarunum eina útreiðslu upp á umleið 60 mió. kr. til at upparbeiða ein uttanlands samferðslutarv fyri síðan, tá peningurin byrjar at koma inn aftur til sonn samfelags borgarar, at lata tað uppbygda til ein felagsskap uttan at gera so mikið sum eina roynd at skaffa samfelagsborgarunum hesa nevndu storu íløgu aftur.

Landsstýrið hevur tvingað hesa útreiðslu niður yvir samfelagsborgararnar, og skuldi tað tí verið ein sjálvfylgja, at landsstýrið letur íløgu borgaranna fáa høvi at forrenta seg aftur.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) viðmerkir:

Í fyrstu syftu er hetta eitt diktat frá landsstýrinum bæði viðvíkjandi ávísum skipi, partapeningi og veðhaldi, og kann ikki undir nøkrum umstøðum verða tikið undir við landsstýrisins viðmerkingum í hesum máli.

Í aðru syftu tó sum ein neyðloysn fyri at varðveita uttanlandssiglingina og ta rutu, »Smyril« hevur upparbeitt, verður tikið undir við fyriliggjandi lógaruppskoti.

Triði minnilutin (Atli P. Dam) førir fram:

Føroya Javnaðarflokkur hevur ferð eftir ferð lagt uppskot fyri tingið um skipan av partafelag við 50% almennari luttøku og 50% partapeningi frá aðrari síðu, hartil uppskot um neyðug landskassaveðhald fyri lánum, soleiðis at eitt trygt og gott grundstøði fekst til vega undir teirri nýggju vinnugrein, Javnaðarflokkurin hevur verið við til at slóða fyri, nevniliga útvegan av hundraðtals arbeiðsplássum á einum øki, føroyingar eiga hópin av útbúnum fólki at virka á.

Samtykt av slíkum uppskoti hevði sloppið tingmonnum undan at avhenda uttan endurgjald eina rutu, sum hitt almenna bygdi upp aftan á, at allar privatar royndir vóru farnar í søguna.

Milliónavirði liggja aftan fyri uppbyggingar av teim rutum, »Smyril« hevur siglt á síðan 1975, og er sjálvt virkisøkið við hesum rutum framyvir milliónir vert. Harumframt má metast, at tann expertisa og »know-how«, strandferðslan hevur savnað og ognað sær, umboða onnur milliónavirði. Tað mátti verið herskið hjá løgtingsmeirlutanum at noyðast at avreiða og geva burtur hesi virði skattaborgaraans uttan nakað sum helst endurgjald, hóast samfelagsvirði koma at verða skapt eisini av nýggja felagnum.

Tað átti ikki at verið lógligt at skaltað so við almennum virðum, men er tað tí verri, tykist. Hin vegin má tað metast at vera moralskt ólógligt.

Ásannandi, at § 13 í samgonguskjalinum fordar fyri, at tann meirluti í tinginum, sum vildi greitt atkvøðu fyri einum helvtarbýti ímillum alment og privat, ikki sleppist at atkvøða, metir Javnaðarflokkurin tað nyttuleyst at endurframseta hetta uppskotið.

Hin vegin metir flokkurin tað rætt at geva tinginum høvi til beinleiðis at taka støðu til ta umsókn, sum nýggja skipafelagið hevur sent landsstýrinum um veðhald og partapening frá almennari síðu.

Óvíst av hvørji orsøk hevur landsstýrið dult hesa fyri tinginum, soleiðis at 1. viðgerð málsins gav tingmonnum og borgarum ta fatan, at felagið er nøgt við landsstýrisins uppskot, men er hetta als ikki í samsvar við veruleikan.

Umsókn felagsins fevndi um 40% í veðhaldi og 30% í partapeningi

til keyp av skipi, sum felagið metir vera tað rætta, og ikki til skip, sum landsstýrið ávísir, heldur ikki hevur felagið biðið um at fáa álagt treytir, sum ikki verða settar øðrum privatum vinnurekandi.

Tingið hevur ikki fingið umstøður til at taka støðu til slíka loysn, og Javnaðarflokkurin loyvir sær at ivast í, at samgongan hevur havt henda møguleika. Fíggjarnevndarviðgerðin avdúkaði, at limir samgongunnar á ongan hátt høvdu fullfíggjaða vitan um, hvat hent er í hesum máli.

Tann møguleiki, at »Gustav Vasa« gleppur felagnum av hondum, tykist ikki hava verið við í metingunum og heldur ikki fylgjan av hesum, nevniliga at tá er neyðugt við nýggjari, tíðarkrevjandi landsstýris- og løgtingsviðgerð, sum helst ger, at ov seint verður at loysa málið áðrenn komandi summarsigling.

Javnaðarflokkurin má í heila tikið átala tað ótrúliga seinføri, landsstýrið hevur sýnt í hesum máli, og tí ósømiligu »giðslaviðferð«, tí hevur verið fyri, tí tað hevur verið tengt upp í tey mongu mál í »pakkanum«, landsstýrið ikki er ført fyri at bera løgtinginum.

Minnilutin setir tí til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

1) Í §1 verður í staðin fyri »20%« sett »30%«.
2) Í stk. 2 verður í staðin fyri »15%« sett »40%«.
3) Sum nýtt 4. stk. til §1 verður sett:
   »Eisini er landsstýrinum landskassans vegna heimilað at veðhalda fyri rakstrarláni upp í 12 mió. kr.«

1) I §1 indsættes i stedet for »20%«: »30%«.
2) Stk. 2 indsættes i stedet for »15%«: »40%«.
3) Som nyt stk. 4 i §1 tilføjes:
   »Landsstyret landskassens vegna får også bemyndigelse til at garantere for driftslån op til 12 mio. kr.«

Í aðru syftu vil Javnaðarflokkurin umhugsa aðrar loysnir, men verður støða tikin til slík uppskot í tingsalinum. Aðrar loysnir og serliga landsstýrisins uppskot geva ikki felagnum nóg trygt fíggjarligt støði, tá lánini verða ov dýr og ólagalig og eginpeningsgrundarlagið munandi veikari. Eisini er uppskot landsstýrisins slíkt »sjuskarbeiði«, at tað onga støðu tekur til, hvaðani rakstrarpeningur kann útvegast.

Hartil er tað óforsvarligt ikki at hava samráðst um eina greiða avtalu við felagið um endurgjaldið til tað almenna fyri ruturnar og inntøkumøguleikan á teimum og fyri »know-how« og hjálp frá Strandfaraskipum Landsins. Rættari hevði verið, at avtala um gjald fyri hesi virði fyrilá, og at slík loyvdi felagnum at avdraga hetta endurgjald yvir eitt longri áramál, t.e. 15 ár við 3 avdráttarfríum árum.

Tekur Javnaðarflokkurin undir við einum meiri ófullfíggjaðum uppskoti enn tí, flokkurin sjálvur hevur framsett, ella felagið hevur søkt um, so ger hann tað av fylgjandi grundum:

1. at útvega hóskandi skip til millumlandasigling hevur verið floksins mál, alt síðan »Smyril« varð keyptur. Her liggur so úrslitið av 7 ára trokan á afturhaldið, og er ið hvussu er talan um ábøtur í málinum og eitt stig víðari á eini leið, hitt almenna vísti á, eisini til aðrar at taka upp.
2. Tað verður framyvir møguligt at uppafturbyggja eitt dygt og álitskent samarbeiði millum hetta felag og hitt almenna í útveganini av fleiri skipum og rakstrinum av hesum á teim rutum, sum enn liggja ótroyttar. Tí málið um at útbyggja ferðamanna- og ferjusigling til ein vinnuveg hjá hundraðtals føroyingum er ikki slept av hondum.
3. Tað er Javnaðarfloksins skorðan á og áhaldandi júkan um henda vinnuveg, sum hevur skapt tað fólkakrav, ið nú at enda hevur boygt vilja teirra, sum onga loysn vildu hava, og tann breiða, landsfevnandi undirtøka, partapeningstekningin hevur fingið, hevur gjørt, at felagið fyri so vítt er »alment«, sum tað kundi verið, var tað skattaborgarans peningur, sum ísettur varð beinleiðis úr landskassanum. (Hin vegin er felagið formelt privat, og kann tí ikki sleppast undan viðgerð av endurgjaldsspurninginum).
4. Málið er orðið ein slíkur mylnusteinur um háls Fólkafloksins, at hesin í berari ræðslu ongan sjálvstøðugan politikk megnar at føra í teirri samgongu, ið nú ræður.

   Til tess at fáa meira normaliserað politisk viðurskifti við lutvísari linkan av oki §13 er neyðugt at loysa henda mylnustein av. Tá kanska menn aftur tora at taka náttúrligar avleiðingar av einum samarbeiði, sum ikki virkar, og møguliga útskriva tað val, øll nú eru greið yvir, má verða skjótt, skal eitt stjórnarført stýri aftur fáast í hesum landi.
5. Ávegis loysn — hóast ikki nøktandi — í málinum nú kann kanska forða fyri, at íslendingar, norðmenn, danir og áður einsamallir heysta fruktirnar av tí megnararbeiði, Strandferðslan og manningar hennara hava framt nú í nógv ár.

Í ávísum føri framt yvir evni, tá hugsað verður um tað risaarbeiði,

borgarligir politikkarar hava lagt í at mótarbeiða hesum nýggja vinnuvegi.

2. viðgerð 4. februar. Uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 31-0, §2 uttan atkvøðugreiðslu. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Atli Dam) §1, stk. 1 fall við 12-0, stk. 2 fall við 12-0, nýtt 3. stk. fall við 12-0.

4. februar legði Javnaðarflokkurin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í § 1, stk. 1, verður í staðin fyri »ferðamannaskipinum Gustav Vasa«« sett »ferðamannaskipi«.

3. viðgerð 4. februar. Uppskot landsstýrisins soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið fall við 12-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1800-41-2 Lóg nr. 22 frá 4. mars 1983

# 58. Nágreinilig kanning av tryggingarviðurskiftunum viðvíkjandi landskassaveðhildnum lánum

Ár 1983, fríggjadagin 4. februar legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya Løgting samtykkir at niðurseta eina óvilduga nevnd at kanna til botns øll viðurskifti landskassans og landsstýrisins mótvegis m/t »Jatnaklettí« og eigarum hansara. Kanningin eigur m.a. at umfata fylgjandi spurningar:

1. Hví vóru landskassans veðhaldsskyldur í skipinum ikki tryggjaðar hjá Tryggingarsambandi Føroya ella í aðrari trygging?
2. Hví landsstýrið ikki hevur syrgt fyri at rætta upp á forsømilsi eigarans fyri at tryggja landskassanum móti missi, um eldur kom í skipið, ella annað óhapp gjørdi, at tryggingin kom til útgjaldingar?
3. Um landsstýrið hevur givið eigaranum loyvi til at nýta landskassans part av tryggingarpeninginum at loysa seg sjálvar frá persónligum veðheftingum til leysa skuld (kreditorar), vekslaskuld og keypssáttmálaskuld upp á tilsamans 948.000 kr. + møguliga persónliga kautión av útgerðarláni, stórt 580.000 kr., og lán nr. 0324509 í P/f Sjóvinnubankanum, stórt kr. 980.000.

4. Um landsstýrið hevur heimild til tær dispositiónir, ið nevndar eru undir pkt. 3?
5. Um talan er um negativt tryggingarsvindil, soleiðis at skilja, at eigarin, ókontrolleraður av landsstýrinum til egnan fíggjarligan løtuvinning, hevur havt pantið (skipið) undirtryggjað við tí úrsliti, at landskassin kemur at hanga upp á uml. 1,4 mió.kr., um svarið til spurning 3 verður noktandi, og annars tilsvarandi meira, heilt upp til 3,1 mió.kr. (skipið var tryggjað fyri 4 mió.kr., meðan veðhaldsskyldan eftir øllum at døma hevur verið 5,4 mió.kr. umframt eina leysaskuld v.m. upp á tilsamans 969.000 kr.), uttan so at ein umbyggingartransaktión fer fram.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 4. februar 1983 og undir 1. viðgerð 17. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum verður løgtingið at niðurseta nevnd at kanna øll viðurskifti landskassans og landsstýrisins mótvegis m/t »Jatnakletti« og eigarum hansara. Kanningin skal m.a. lýsa 5 í uppskotinum tilskilaðar spurningar.

Fíggjarnevndin hevur tann 27. apríl 1983 havt fund við Johan Djurhuus, skrivstovustjóra á landsskrivstovuni, og fulltrúan, ið hevur havt málið um hendur.

Skrivstovustjórin greiddi frá gongdini í málinum í umsitingini. Limir í fíggjarnevndini nómu við spurningin um tann felagsform, ið nýttur var, áðrenn skipið seinast var selt (P/r) og eftir eigaraskifti (P/f).

Komið varð inn á virðismetingina í málinum. Eisini vóru tryggingarviðurskiftini umrødd.

Á fundi í fíggjarnevndini tann 28. apríl 1983 vóru umboð fyri Føroya Sjóvátrygging og greiddu frá tryggingarliga táttinum í málinum. Undirstrikað var, at skrokktryggingin upp á kr. 4 mió. var mett at vera bein. Greitt var frá mannagongd viðvíkjandi tryggingini av krøvum hjá lángevarum, herundir útgreinað, hvat ein »interessutrygging«, ið kann mest røkka 20%, er. Upplýst var, at talan var um lutvísan skaða, og tá røkkur interessutryggingin ikki.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen) tekur til eftirtektar tað, ið er ført fram frá teimum, ið hava verið á fundi við fíggjarnevndina um hetta mál, og tekur ikki undir við uppskotinum til samtyktar.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) førir fram, at undir viðgerðini av málinum í fíggjarnevndini kom mangt forvitnisligt fram, eisini ting, ið eiga at fáa fíggjarnevndina at átala ólógligar mannagongdir, eins og ting, ið eiga at fáa fíggjarnevndina at fyristíla, at bundið verður um heilan fingur.

Soleiðis kom fram:

1) at í hesum serliga føri var skipið ikki tryggjað, soleiðis sum møguleikar vóru til tess, við tað at ongin interessutrygging var teknað, hóast loyvt er at hava eina tílíka við upp til 20% av skrokkvirðinum, og at hon einans hevði kostað kr. 13.000 árliga.
2) at ongin føst avtala er millum landsstýrið og tryggingina, sum tryggjar, at tey lán v.m., sum landskassin veðheldur fyri, til eina og hvørja tíð eru tryggjað við teirri upphædd, sum neyðugt er, um landskassin skal fáa sítt veðhald aftur, um totalforlis skuldi fyrikomið.
   at tað útmerkað kunnu »hanga« í hundraðum av miliónum, sum ikki eru tryggjaðar.
4) at tað einasta, sum í løtuni nøkunlunda tryggjar, at landskassans veðhald eru tryggjað, er, at Tryggingarsambandið hevur møguleika at síggja saldolistan hjá Føroya Gjaldstovu, men at hetta á ongan hátt tryggjar landskassanum, at tryggingarupphæddirnar eru a jour.
5) at í málinum um Jatnaklett var ein »fyribils« ólógligheit farin fram, ella sum tikið var til av skrivstovustjóra landsstýrisins, »har var eitt hol í« viðvíkjandi ábyrgdarspurninginum, við tað at eigararnir blivu frítiknir fyri ta fíggjarligu ábyrgdina, áðrenn skipið var umbygt.
6) at landsstýrið hevur ætlanir um at tryggja tann peningin, sum mistur er í Jatnakletti við at tinglesa hana inn í ein í virðisneting uppskrivaðan umbygdan Jatnaklett.
7) at virðið av tí, sum eftir er av Jatnakletti, er maximalt 1,7 mill. kr. treytað av, at báturin verður afturgjørdur ella umbygdur,
   *at* umbyggingin er mett at kosta góðar 6 mill. kr.,
   *at* landskassans veðhald verður tryggjað sum seinasti prioritetur, um so verður, at metingarstovnurin, ið er stovnur undir

landsstýrinum, so sum teir hava lovað landsstýrinum í skrivi, metir Jatnaklett til knappar 10 mill. kr.,-tá og hvis umbyggingin verður liðug.

8) at løgmaður hevur ábyrgd av øllum hendingum og handlingum í landsstýrinum.
9) at løgmaður uttan lógarheimild hevur loyst sín kjøtliga bróður saman við 2 øðrum úr milliónaábyrgd yvir fyri landskassanum.
10) at ein handling, har ein løgmaður uttan heimild fritekur egna kjøtliga bróður fram um onnur frá millióna ábyrgd, kann føra við sær eina álvarsliga spillu í okkara siðalæru (morali), og at tað kann føra við sær endurtakingar og tí kann blíva samfelagsrotandi.

Út frá tí, ið her er framført, metir minnilutin, at løgmaður, um hann ynskir at varðveita respekt fyri sær sjálvum, eigur beinan vegin, í mótsetning til Richard Nixon, at leggja frá sær. Ger hann tað ikki, so eigur tingið, fyri at varðveita metingina og virðing fyri tinginum millum manna, at avseta løgmann alt fyri eitt.

Minnilutin setir fram hetta

**I. Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á løgmann um beinan vegin at leggja frá sær.

Og fyri at tryggja landskassan móti møguligum óneyðugum tapi setir minnilutin fram soljóðandi

**II. Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at siggja til, at øll landskassaveðhald framyvir eru forsvarliga tryggjað, og at fast samband í so mátar verður sett á stovn millum Tryggingarsambandið Føroyar og Føroya Landsstýri.

Annars metir minnilutin ikki, at málið hevur fingið nóg objektiva viðgerð til, at hon kann kallast ein kanning við tað, at figgjarnevndin ikki var óvildug, tí at av 7 limum var
*tann eini* uppskotsstillarin sjálvur
*tann annar* samreiðari við í minsta lagi ein av teimum, sum áttu umhandlaða skip,

*tann triði* kjøtligi bróður at einum av teimum, sum áttu umhandlaða skip, og
*tann fjórði* partamaður hins triðja.

Tí heitir minnilutin á tingið um at viðtaka upprunauppskotið.

Minnilutin (Atli P. Dam) førir fram, at tað eftir fíggjarnevndarviðgerðini, har m.a. skrivstovustjóri landsstýrisins og fulltrúi hava givið frágreiðing, stendur greitt, hvat hent er í málinum. Eisini hevur Tryggingarsambandið givið frágreiðing.

Eftir stendur, at landsstýrið vitandi ella av gáloysni hevur givið teimum, i áttu m/t »Jatnaklett«, lutvísa trygd í tryggingarpeninginum og fulla trygd í persónligu ábyrgd eigaranna.

Eftir eldsbrunan gevur landsstýrið loyvi til, at felagið verður umlagt til P/f Nýpusker, og loyvi til, at tryggingarpeningurin partvís verður nýttur til at gjalda lán, sum partsreiðararnir persónliga heftu fyri, meðan tey landskassaveðhildnu vera ógoldin, soleiðis at landskassin nú eigur á hjá einum felag við negativum eginpeningi og ov lítlum virði í brenda skrokkinum til, at landskassans lán kunnu pantitryggjast innan fyri skrokkvirðið.

Hetta virðið kann bert økjast, um skipið verður umbygt og nýmett til eitt virði nakað omman fyri 9 mill. kr.

Í uppvurderaða skipinum vil tí eisini koma fram neyðugur eginpeningur.

Minnilutin er samdur í, at skrokkurin, sum uttan umbygging bert hevur »skrokkvirði«, sum liður í nýggjum projekti fær eitt annað virði, tá projektið er framt, og mótmælir sostatt ikki hesum, men metir tað skilagott, at umbygging verður framd.

Men tað, sum er skeivt og átaluvert, er, at landsstýrið gevur eigarunum sersøn.lir og loysir teir úr persónligum ábyrgdum, áður enn tey virði eru, sum skulu verða, fyri at pláss verður í prioritetsstøðuni til landskassa- og landskassaveðhildin lán, t.v.s. áður enn umbyggingin er framd, og landskassanum er givið pant í nýggja skipinum.

Tá málið nú tykist vera fult upplýst, metir minnilutin ikki, at tørvur er á teirri av Adolf Hansen uppskotnu kanningarnevnd, serliga tí at Tryggingarsambandið heldur fast við, at tryggingarvirðið uppá 4 mill. kr. var rætta virðið, skipið hevði áðrenn eldsbrunan.

Minnilutin (Hilmar Kass) førir fram:

Uppskotið hjá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum er um at seta nevnd at kanna tryggingarviðurskiftini viðvíkjandi landskassaveðhildnum lánum, serstakliga í sambandi við eldsbruna á m/t »Jatnakletti«.

Í teim frágreiðingum, sum eru fingnar til vega undir nevndarvið-

gerðini, er tað komið fram, at landsstýrið í ov lítlan mun ansar eftir, at veðhaldsskyldur landsins eru tryggjaðar forsvarliga.

Í sambandi við viðgerðina av tí ávísa skipinum »Jatnaklettí« verður átalað tann óvanliga viðgerð, hetta mál hevur fingið í landsstýri og fíggjarnevnd:

1. Skipið brennur, og 3,3 mill. kr. verða útgoldnar frá tryggingini. Hesin peningur verður nýttur at gjalda aðra skuld enn ta, sum átti veðhald í skipinum, har landskassin veðhelt fyri stórar upphæddir, sum ikki vórðu goldnar.
2. Landsstýrið gav loyvi til, at ognarviðurskiftini vórðu umskipað frá partreiðarfí til partafelag og loysti partreiðararnar frá ábyrgd teirra mótvegis landsstýrinum, hóast lániviðurskiftini ikki vóru á lagi, og skuldin var um 1,2 mill. kr. hægri enn metta virðið. Hetta er ikki hent fyrr og er skeiv framferð.
3. Landsstýrið saman við meiriluta í fíggjarnevndini — partur av samgonguni saman við parti av andstøðuni — samtykti at veðhalda fyri 70% av 4,7 mill. kr., og eisini samtykti landsstýrið at geva stuðulslán av somu upphædd til partafelagið, ið nú stendur fyri skipinum, til at umbyggja skipið og umvæla skaðan, eldsbrunin hevði volt.

   Sambært metingarvirðið var eingin eginpeningur. Partafelagið hevur ein partapening, sum er 650 tús. kr. Skuldin í skipinum var um 2,9 mill. kr. Sambært tryggingarupphæddina var skipið ikki vert meira enn 700 tús. kr. Skipið var tryggjað fyri 4 mill. kr., og 3,3 mill. kr. var eldskaðin mettur til. Sambært metingina hjá sakkønum í landsstýrinum var virðið um 1,7 mill. kr. Framvegis resta 1,2 mill. kr. í, og tá partapeningurin ikki er meira enn 650 tús. kr., so resta 550 tús kr. í, til tað er slætt borð, áðrenn vit koma til eginpeningin til umbyggingina.
4. Umvælingin og umbyggingin verða mettar at kosta 6,5 mill. kr. Tryggingin hevur goldið 3,3 mill. kr. til umvælingina, so tað kann ikki vera rætt, at landskassin veðheldur og gevur stuðulslán út frá eini upphædd, sum er 4,7 mill. kr., tí munurin millum útreiðslurnar til umbygging og tað, tryggingin hevur goldið fyri eldskaðan, er ikki meira enn 3,2 mill. kr. Um tann ivasama umlegging frá partreiðarfí til partafelag ikki var framd, hevði hetta ikki latið seg gjørt.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur onga støðu í málinum.

2. viðgerð 18. mai.

Løgtingstíðindi 1982 A — 47

Uppskotið frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum fall við 7-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar I frá minniluta í fíggjarnevndini (Adolf Hansen) fall við 15-0, og uppskot til samtyktar II varð samtykt við 17-0 atkvøðum.

# 59. Løgtingslóg um ítróttavedding

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um ítróttarvedding.**

**§1.** Landsstýrið kann veita loyvi til vedding í samband við ítróttarkappingar.
*Stk. 2.* Loyvishavarin kann við góðkenning landsstýrisins áseta reglur um veddingina og framleiðslu av úrslitum, ið eru neyðug vegna avlýsing ella útseting av kappingum.

**§2.** Loyvi kann bert veitast einum partafelag og bert fyri 5 ár í senn.
*Stk. 2.* Reglurnar í partafelagslógini eru galdandi fyri felagið í øllum viðurskiftum, har aðrar reglur ikki eru ásettar í hesi lóg.

**lagtingslov om tipning.**

**§1.** Landsstyret bemyndiges til at meddele bevilling til tipning i forbindelse med idrætskonkurrencer.
*Stk. 2.* Bevillingshaveren kan med landsstyrets godkendelse fastsætte bestemmelser for tipningen og om frembringelse af resultater, der er nødvendige på grund af aflysning eller udsættelse af idrætskampe.

**§2.** Bevilling kan kun gives et aktieselskab og kun for 5 år ad gangen.
*Stk. 2.* Bestemmelserne i aktieselskabsloven kommer til anvendelse på dette selskab for alle forhold, hvor andre bestemmelser ikke er fastsat i denne lov.

*Stk. 3.* Viðtøkur felagsins og broytingar í viðtøkunum skulu góðkennast av landsstýrinum.

**§3.** Partapeningurin í felagnum skal vera 50.000 kr. Av partapeninginum teknar landskassin 20%, meðan hin partapeningurin verður boðin Ítróttasambandi Føroya (Í.S.F.) til tekningar.
*Stk. 2.* Felagið verður stjórnað av eini 5-manna nevnd, ið skipar seg sjálv.
*Stk. 3.* Landsstýrið góðkennir samsýning til nevndarformann og limir og lønir til stjóra og starvsfólk.

**§4.** Av peninginum, sum veddað verður fyri, skulu 60% nýtast sum vinningur til vinnarar.

**§5.** Av vinningum yvir 500 kr. verður goldið gjald til landskassan uppá 15%. Vinningarnir koma annars ikki undir skatt til landskassa ella kommunu.

**§6.** Av yvirskotinum, aftan á útgjalding av vinningum, fyrisiting, avskriving, burturlegging, vinningsbýti v.m., verða 80% nýtt til ítróttarendamál og 20% til stuðling av ymiskum ungdómsarbeiði.
*Stk. 2.* Nevndin tekur avgerð um, hvussu peningurin skal býtast.

*Stk. 3.* Selskabets vedtægter og ændringer i disse skal godkendes af landsstyret.

**§3.** Aktiekapitalen i selskabet skal være på 50.000 kr. Af aktiekapitalen tegner landskassen 20%, medens den øvrige kapital tilbydes Ítróttasamband Føroya (Í.S.F.) til tegning.
*Stk. 2.* Selskabet ledes af en bestyrelse på 5 medlemmer, der konstituerer sig selv.
*Stk. 3.* Landsstyret godkender vederlag til bestyrelsesformand og medlemmer og løn til direktør og funktionærer.

**§4.** Af summen, som der tippes for, skal 60% anvendes til gevinster til vinderne.

**§5.** Af gevinster over 500 kr. betales en afgift til landskassen på 15%. Gevinsterne er ellers fritaget for skat til land eller kommune.

**§6.** Af overskuddet, der fremkommer efter udbetaling af gevinster, administration, afskrivning, henlæggelser, udbytte m.v., fordeles 80% til idrætsformål og 20% som tilskud til forskellige ungdomsaktiviteter.
*Stk. 2.* Bestyrelsen træffer bestemmelse om fordeling af beløbene.

§7. Felagið kann draga frá í skattskyldugu inntøkuni tað, ið útbýtt verður sambært §6.

§7. Selskabet kan i den skattepligtige indtægt fradrage det beløb, der er udbetalt i henhold til §6.

§8. Fyriskipan av aðrari ítróttavedding, sum ikki hevur heimild í hesi lóg og fyriskipan sum millummaður við løn fyri luttøku í útlendskari ítróttarvedding, verður revsað við bót, hefti ella fongsli í upp til 6 mánaðir.
*Stk. 2.* Hann, ið tekur lut í ólógligari ella ólógliga fyriskipaðari ítróttavedding eftir stk. 1, verður revsaður við bót.

§8. Foranstaltning af anden tipning, som ikke har hjemmel i denne lov, samt formidling som mellemmand med løn for deltagelse i udenlandsk tipning, straffes med bøde, hæfte eller fængsel i indtil 6 måneder.
*Stk. 2.* Den, der deltager i ulovlig eller ulovligt formidlet tipning efter stk. 1, straffes med bøde.

§9. Mál um brot á hesa lóg verða framd sum løgreglumál. Fyri mál, ið verða reist eftir §8, stk. 1, koma rættarstigini í kap. 68-69 og 71-72 í rættargangslógini í nýtslu í sama mun sum í málum, ið eftir vanligum reglum verða framd sum statsadvokatmál.

§9. Sager angående overtrædelse af denne lov behandles som politisager. For så vidt angår sager, der rejses i henhold til §8, stk. 1, finder de i lov om rettens pleje kap. 68-69 og 71-72 omhandlede retsmidler anvendelse i samme omfang som i sager, som der efter almindelige regler tilkommer statsadvokaten at forfølge.

§10. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§10. Denne lov træder straks i kraft.

**Viðmerkingar:**
Tað hevur leingi verið ynski millum ítróttaráhugað, at skipað verður fyri vedding innan ítrótt í Føroyum. Antin soleiðis, at loyvt verður Dansk Tipstjeneste A/S at seta á stovn deild her á landi, ella at sett

verður á stovn eitt føroyskt veddingarfelag.

Landsstýrið hevur arbeitt við málinum saman við Ítróttarsambandi Føroya, og úrslitið av hesum er hjálagda uppskot til løgtingslóg um ítróttarvedding.

Ætlanin er at skipa fyri vedding um fótbóltsdystir í føroysku landskappingini (1., 2., 3. og yngri deildum) um summarið. Tey fimm vikuskiftini, tá stevnur eru og eingin regluligur landskappingardystur, kann verða veddað um úrslitið av kappróðrinum t.d. soleiðis:

Hvør verður nr. 1 og 2 av 10-mannaførunum .....
nr. 1 og 2 av 8-mannaførunum .....
nr. 1 og 2 av 6-mannaførunum .....
(dreingir)
nr. 1 og 2 av 6-mannaførunum .....
(gentur)

Í vetrarhálvárinum kann veddað verða um føroyskar hondbóltsdystir og enskar fótbóltsdystir.

Treytin fyri at kunna hava eina sjálvstøðuga føroyska vedding er, at sølan verður so stór, at vinningarnir kunnu gerast lokkandi.

Verður veddað lutfalsliga líka nógv sum í Danmark, kemur sølan at verða umleið 10 mió. kr. árliga. Mett verður, at nú verður veddað fyri 10.000 kr. um vikuna í donsku veddingini, sjálvt um bert fá fólk luttaka. Viðvíkjandi áhuganum fyri at luttaka í vedding kann upplýsast, at talið á áskoðarum til fótbóltsdystir í 1. deild er umleið 1.500. Sostatt kann metast, at talið á áskoðarum um vikuna til dystir í øllum deildunum er umleið 8-10.000 áskoðarar. Eisini kann roknast við, at onnur enn fótbóltsáskoðarar hava áhuga fyri at luttaka í vedding.

Í donsku veddingini eru 13 dystir á veddingarseðlinum. So nógvar dystir kunnu vit ikki hava á føroysku veddingarseðlunum, um møguleikar skulu verða fyri at hava allar dystirnar rættar, av ti at talið av innsendum røðum verður tilsvarandi minni í Føroyum. Hóskandi tal av dystum á veddingarseðlunum er helst 9 ( kanska 8).

Kombinatiónsmøguleikarnir í mun til talið á dystum er $3^x$ ella:

| *Dystir* | *Møguleikar* |
|---|---|
| 1 | 3 |
| 2 | 9 |
| 3 | 27 |
| 4 | 81 |
| 5 | 243 |

| | |
|---|---|
| 6 | 729 |
| 7 | 2.187 |
| 8 | 6.561 |
| 9 | 19.683 |
| 10 | 59.049 |
| 11 | 177.147 |
| 12 | 531.441 |
| 13 | 1.594.323 |

Verður veddað fyri 5 mió. kr. árliga ella 100.000 kr. um vikuna, og vinningurin verður settur til 60% av innkomna peninginum, kunnu vinningarnir verða mettir til fylgjandi, um vinningurin verður býttur javnt millum teir, ið hava 9 rættar og 8 rættar:

*9 rættar:* 5 vinnarar á 6.000 kr., ella í mesta lagi 30.000 kr., um bert ein vinnari hevur allar dystirnar rættar.

*8 rættar:* 15 vinningar á 2.000 kr. í part.

Henda søla hevði givið I.S.F. 2 mió. kr. í inntøkum ÷ fyrisitingarútreiðslur.

Verður veddað fyri bert 2 mió. kr. ella 40.000 kr. um vikuna, verða vinningarnir (60% av inntøkunum) fylgjandi:

*9 rættar dystir:* 5 vinnarar á 2.500 kr., tó hægst 12.000 kr. til ein vinnara.

*8 rættar dystir:* 15 vinnarar á 800 kr.

Henda søla hevði givið Í.S.F. í sín part 800.000 kr. ÷ fyrisiting, sum eisini hevði loyst seg fyri Í.S.F., men hertil er at siga, at um sølan fer niðan á hesa upphædd, er tað ivasamt, hvussu stórur áhugin hevði verið fyri vedding, av tí at vinningarnir verða ov smáir.

Tosað hevur við við postverkið, sum vil átaka sær at gera eina serliga giroblankett, sum kann nýtast sum veddingarseðil. Postverkið vil eisini, um hetta verður ynskt, taka sær av at leita eftir vinnarunum. Hugsað verður um at hava 10 røð á 1 kr. á hvørjari giro-ávísing. Í donsku veddingini kostar eitt rað 75 oyru. Um postgiroávísingar kunnu nýtast sum veddingarseðlar, verður lætt hjá øllum at taka lut í veddingini.

Mett verður, at sølan í einari serligari føroyskari vedding verður 5-10 mió. kr. árliga, og at vinningarnir sostatt verða nóg stórir til, at fólk fær áhuga fyri at luttaka í veddingini.

Um tiltakið fær nóg stóra undirtøku, kann Í.S.F. sostatt fáa eitt munandi ískoyti til rakstur aftur at tí játtan, sambandið fær um fíggjarløgtingslógina.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og við 1

1. viðgerð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fundir við Í.S.F. um málið. Ítróttarsambandið viðmælir uppskotinum, men ynskir tó, at §4 verður broytt soleiðis, at vinningurin verður 50% í staðin fyri 60%, og at talið av nevndarlimum eftir §3, 2. stk. kann verða 5 ella 7 limir.

Vísandi til frammanfyri standandi mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við fylgjandi

**Broytingum**

| | |
|---|---|
| 1) Í §3, 2. stk. verður »5-manna-nevnd« broytt til: »5- ella 7-mannanevnd«. | 1) I §3, stk. 2 ændres »5 medlemmer« til: »5 eller 7 medlemmer«. |
| 2) Í §4 verður »60%« broytt til: »50%«. | 2) I §4 ændres »60%« til: »50%«. |

2. viðgerð 13. apríl. §§ 1-3 samtyktar við 24-0 atkvøðum, §3 við broyting frá lóganevndini samtykt við 24-0, §§ 4-9 samtyktar við 24-0.

3. viðgerð 26. apríl. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 528-1. Lóg nr. 50 frá 20. mai 1983

# 60. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.**

§1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1983/84 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.**

§1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1983/84 at garantere for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 28 frá 11. mars 1982, sum fer úr gildi 31. mars 1983. Lógin skal bert galda komandi fíggjarár.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð tann 17. s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið á fundi sama dag, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 2. mars. 3. viðgerð 8. mars. Uppskotið varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1408-5-2. Lóg nr. 38 frá 14. apríl 1983

# 61. Skúlabarnatannarøkt v.m.

Ár 1983, fríggjadagin 11. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

I. Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja viðlagda uppskot (skjal 1) til kongaliga fyriskipan um sambært §9 í lóg nr. 217 frá 19. mai 1971 »om børnetandpleje« at seta lógina í gildi fyri Føroyar.

II. Løgtingið samtykkir fyri sín part og mælir til, at nýstovnaðar kommunalar skúlatannlæknastovur fáa stuðul frá landskassanum eftir somu reglum sum heilsumiðstøðir. Tó fáa skúlatannlæknastovur, ið verða bygdar sum integreraður partur av skúlabygningi, studning eftir somu reglum sum fólkaskúlabygging. Til víðkan av skúlatannlæknastovu og til umfatandi nútíðargerð av verandi skúlatannlæknastovum, men ikki til umvælingar ella útskifting av slitnum lutum o.t., verður stuðul latin eftir reglunum frammanfyri.

III. Løgtingið samtykkir fyri sín part og mælir til, at settur verður ein tannlækni við virkisøkinum at viðgera næmingarnar á Skúlanum Trøðni og sjúklingarnar á psykiatrisku deildini á Landssjúkrahúsinum og búfólkini á Eirargarði, og soleiðis at tannlæknin hevur eina tannlæknastovu á skúlanum og eina á sjúkrahúsinum.

## IV. Uppskot til

**løgtingslóg um, at Løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 verður sett úr gildi.**

**§1.** Løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 um tannlæknaskipan verður sett úr gildi.

**§2.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**lagtingslov om, at lagtingslov nr. 38 af 11. juni 1958 ophæves.**

**§1.** Lagtingslov nr. 38 fra 11. juni 1958 om en tandlægeordning ophæves.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Á fundi í landsstýrinum 29. december 1977 varð samtykt at seta nevnd at kanna lóggávuna um skúlabarnatannarøkt, ortodontiska viðgerð, tannaviðgerð av børnum á Skúlanum á Trøðni og tannaviðgerð av sjúklingum á psykiatrisku deildini á Landssjúkrahúsinum. Í nevndini hava sitið Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, formaður, Sigvald Kristiansen, kommunulækni, Skála, Erling Johannesen, tannlækni, Tórshavn, Dánjal Tausen, bygdarráðsformaður, Sørvágur, og Jóngerð Purkhús, fulltrúi, skrivari hjá nevndini.

Nevndin hevur í juni mánaði 1982 lagt frá sær álit og tilmæli viðvíkjandi skúlabarnatannarøkt v.m. (skjal 2). Landsstýrið tekur undir við tilmæli nevndarinnar og vísir til viðmerkingarnar í álitinum.

Ein fylgja av nýskipanini er, at løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 um tannlæknaskipan ikki longur er neyðug og tí verður sett úr gildi smb. pkt. IV. Løgtingslógin, sum tekur av løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958, verður ikki lýst, fyrr enn nýskipanin er farin at virka.

*Sí skjølini 11 A-L*

1. viðgerð 18. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 18. mars 1983 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið frá landsstýrinum er í 4 pørtum.

I. At seta donsku lógina »om børnetandpleje« í gildi í Føroyum.
II. At veita sama stuðul til nýggjar kommunalar skúlatannlæknastovur sum til heilsumiðstøðir ella til fólkaskúlabygging, um stovurnar eru integreraður partur av skúlabygningi.
III. At seta ein tannlækna við virkisøkinum Skúlin á Trøðni, Psykiatrisku deild Landssjúkrahússins og Eirargarð 14-16.
IV. Avtøka av løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 um tannlæknaskipan.

Við 1. viðgerð av málinum var nógv umrødd støðan hjá brekaðum fólki, sum ikki gingu á Skúlan á Trøðni ella búðu á stovni. Eisini vóru møguleikarnir fyri ortodontiskari viðgerð umrøddir.

Sosiala nevndin hevur havt fund við tveir skúlatannlæknar og sertannlæknan í ortodonti um málið sum heild og serliga teir báðar nevndu spurningar.

Viðvíkjandi tannarøktini hjá teim brekaðu er nevndin komin til ta niðurstøðu, at hvat ið uppskoti *III* viðvíkur, umfatar hetta møguleikan fyri allari tannarøkt og tannlæknaeftirlitið hjá øllum, sum eru undir serforsorg, tað vil siga eisini teimi, sum búgva privat og ikki eru í undirvísingarskyldugum aldri. Fyri tey, sum hava viðgerð undir narkosu fyri neyðini, má tannlæknin hava rætt at gera hetta á sjúkrahúsinum.

Viðvíkjandi ortodontiskari viðgerð mælir nevndin til, at hendan verður gjørd í samarbeiði við sertannlæknan. Tá ið skúlatannlæknarnir meta tað neyðugt, verða næmingarnir vístir til sertannlæknan. Um næmingurin hevur ortodontiska viðgerð fyri neyðini aftaná 14 ára aldur, verður viðgerðin goldin av tí almenna, inntil viðkomandi fyllir 18 ár.

Av tí, at tað er ymiskt, sum ger tað neyðugt við ortodontiskari viðgerð, tað kann t.d. vera ættarbregði, er tað rættast, at kommunurnar rinda ortodontiska viðgerð í eina pulju eftir samlaða barnatalinum og ikki eftir, hvussu nógv í hvørjari kommunu sær eru undir hesi viðgerð.

Nevndin mælir til, at skipanin kemur í gildi hin 1. august 1983, og at hon verður endurskoðað í tingsetuni 1986.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Jógvan Sundstein, Karin Kjølbro, Frederik Olsen og Jóannes Dalsgaard harmast tó um, at skipanin verður gjøgnumført á hendan hátt heldur enn við at útbyggja higartil galdandi løgtingslóg og harvið varðveita eina føroyska skipan.

2. viðgerð 17. mai. I samtykt við 24-0, II við 29-0, III við 30-0 og IV við 27-0, at fara til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 914-10. Lóg nr. 95 frá 25. oktober 1983

# 62. Prístalsviðgerð av lønum

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn.**

§1. Í løgtingslóg nr. 36 frá 21. mai 1975 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn, sum broytt við løgtingslóg nr. 21 frá 7. mars 1980, verða gjørdar hesar broytingar:

1) §1, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Sum endurgjald fyri avlopsstig eftir gamla prístalinum verður frá 1. apríl 1983 at rokna veitt eykaviðbót til tímalønir uppá 18 oyru um tíman.«

2) §2 verður orðað soleiðis:

»Sum endurgjald fyri avlopsstig eftir gamla prístalinum verður frá 1. apríl 1983 at rokna veitt viðbót uppá kr. 31,50 um mánaðin til tær mánaðarlønir, sum eftir lóg, sáttmála ella avtalu verða prístalsviðgjørdar við 105 kr. um mánaðin ella 1.260 kr. árliga fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100.«

§2. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1983.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om pristalsbehandling af arbejdslønninger.**

§1. I lagtingslov nr. 36 af 21. maj 1975 om pristalsbehandling af arbejdslønninger, som ændret ved lagtingslov nr. 21 af 7. marts 1980, foretages følgende ændringer:

1) §1, stk. 2 affattes således:

»Som kompensation for overskydende points efter det gamle pristal ydes fra 1. april 1983 et tillæg til timelønninger på 18 øre pr. time.«

2) Som ny §2 indsættes:

»Som kompensation for overskydende points efter det gamle pristal ydes fra 1. april 1983 at regne et tillæg på kr. 31,50 pr. måned til de månedslønninger, som efter lov, overenskomst eller aftale pristalsreguleres med 105 kr. om måneden eller 1.260 kr. årlig for hver 3 points udsving i pristallet ud over 100.«

§2. Denne lov træder i kraft 1. april 1983.

**Viðmerkingar:**
Í øðrum tingmáli er skotið upp at føra prístalið aftur til 100 pr. 1. januar 1983. Prístalið er eftir higartil galdandi skipan 145,9 pr. 1. januar 1983. Dýrtíðarviðgerð av lønum er farin fram fyri hvørji full 3 stig. Dýrtíðarviðgerðin pr. 1. januar 1983 svarar til 145 stig, t.v.s. at 0,9 stig leypa av. Tímalønin og mánaðarlønin verða dýrtíðarviðgjørdar við ávikavist 60 oyrum um tíman og 105 kr. um mánaðin fyri hvørji full 3 stig, og svara nevndu avlopsstig til 18 oyru hjá tímaløntum og 31,50 hjá mánaðarløntum, sum landsstýrið skjýtur upp, at tey fáa endurgjald fyri.

1. viðgerð 16. februar. Málið varð viðgjørt saman við nr. 64: Broyting í løgtingslóg um prístal. Bæði málini vórðu beind í fíggjarnevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð tann 16. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutir (Atli P. Dam), minnilutin (Ove Mikkelsen) og minnilutin (Adolf V. Hansen) taka støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 11. mars. Atkvøðugreiðsla 18. mars. § 1 varð samtykt við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. mars. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1300-6-3

Lóg nr. 36 frá 14. apríl 1983

# 63. Løgtingslóg um vinningssteðg

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinningssteðg.**

§1. Í løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg sum broytt við løgtingslógunum nr. 51 frá 6. mai 1982 og nr. 103 frá 7. oktober 1982 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í §1, stk. 1, verða orðini »í % pr. vørueind enn tann pr. 7. september 1981« broytt til: »í kr. ella % pr. vørueind enn tann pr. 1. februar 1983.«
2) Í §5 verða orðini »31. august 1983« broytt til: »31. december 1983«.

§2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om avancestop.**

§1. I lagtingslov nr. 54 af 14. september 1981 om avancestop som ændret ved lagtingslovene nr. 51 af 6. maj 1982 og nr. 103 af 7. oktober 1982 foretages følgende ændringer:

1) I §1, stk. 1, ændres ordene »i % pr. vareenhed end den pr. 7. september 1981« til: »hverken absolut eller i % pr. vareenhed end den pr. 1. februar 1983.«
2) I §5 ændres ordene »31. august 1983« til: »31. december 1983«.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg er 2 ferðir framlongd, seinast til 31. august 1983.

Eftir upprunaligu lógini varð settur hámarksvinningur bæði í krónum og prosentum í mun til prísirnar pr. 7. september 1981. Tá lógin varð framlongd við løgtingslóg nr. 51 frá 6. mai 1982, varð hámarksvinningurin í krónum avtikin, tá ein metti, at tað ikki bar til at avmarka vinningin í krónum í ov long tíðarskeið hvørja ferðina.

Eftir fyriliggjandi uppskoti verður mælt til aftur at avmarka vinningin bæði í krónum og prosentum í mun til prísirnar pr. 1. februar 1983. Samstundis verður skotið upp at framleingja lógina til 31. december 1983.

1. viðgerð 16. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 2. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð 16. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 17. februar 1983 viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Atli Dam) førir fram, at í løgtingsmáli nr. 14/1981: Ymisk inntøkulógaruppskot setti Javnaðarflokkurin fram uppskot um prís- og vinningssteðg. Hetta førdi til, at landsstýrið kom við øðrum uppskoti, sum bert umfataði vinningssteðg og ikki prissteðg. Tað seinna varð samtykt.

Javnaðarflokkurin metti og metir framvegis, at ein lóg um vinningssteðg ikki virkar í sama mun, sum ein lóg um prís- og vinningssteðg vildi gjørt. Umboð Javnaðarfloksins heldur, at tað síðani er prógvað, at henda meting floksins var bein.

Í fimm ára tíðarskeiðinum frá 1. apríl 1975 til 1. apríl 1980 hækkaði prístalið við 44,6 stigum. Tað fór úr 100 upp í 144,6. Í tíðarskeiðinum frá 1. aprfl 1980 til 1. januar 1983 er prístalið hækkað við 45,9 stigum. Úr 100 upp í 145,9 stig.

Hetta prógvar, at lógin um vinningssteðg ikki hevur virkað í tann mun, sum landsstýrið metti, og tí vil minnilutin enn eina ferð seta fram aftur uppskot Javnaðarfloksins um prís- og vinningssteðg. Javnaðarflokkurin setir sostatt fram soljóðandi

## Uppskot til

**løgtingslóg um pris- og vinningssteðg.**

§1. Ásettur verður prís- og vinningssteðgur fyri allar vørur í tíðarskeiðinum 21. februar 1983 til 31. december 1983.

§2. Í hesum tíðarskeiði kunnu príshækkanir ikki fara fram við undantak av teimum hækkingum, ið standast av gjøldum til tað almenna, men má vinningur ikki roknast av hesum.

§3. Tó kann Prísráð Føroya eftir umsókn geva loyvi til príshækkingar, tá fullgott prógv er fyri, at so má vera.

§4. Í reglugerð, sum skal góðkennast av fíggjarnevnd Føroya Løgtings, ásetir Føroya Landsstýri nærri reglur fyri, hvussu henda lóg verður at umsita.

§5. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**lagtingslov om pris- og avancestop.**

§1. Pris- og avancestop træder i kraft for alle varer i perioden 21. februar 1983 indtil 31. december 1983.

§2. I dette tidsrum kan der ikke foretages prisforhøjelser med undtagelse af de forhøjelser, der er forårsaget af afgifter til det offentlige, men fortjeneste må ikke beregnes af disse.

§3. Dog kan Færøernes Prisråd efter ansøgning give tilladelse til prisforhøjelser, såfremt tilfredsstillende bevis føres for, at dette er nødvendigt.

§4. I reglement, der skal godkendes af Lagtingets finansudvalg, fastsætter Færøernes landsstyre nærmere regler for, hvordan denne lov skal administreres.

§5. Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Erlendur Patursson) tekur ikki undir við uppskotinum og viðmerkir, at samgongan skinklar í hesum máli hóast samgonguorðingina til henda spurning, og tekur annars støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) kann ikki ganga við til tálman av tí náttúrliga prísútviklinginum, við tað at hetta altíð førir við sær eina seinkaða, men fossandi dýrtíð.

2. viðgerð 4. mars. §1 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 29-0, §2 uttan atkvøðugreiðslu. Uppskot frá minniluta (Atla Dam) §1 fall við 13-0.

3. viðgerð 23. mars. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 115-24. Lóg nr. 35 frá 14. apríl 1983

---

# 64. Broyting í løgtingslóg um prístal

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prístal.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal, sum broytt við løgtingslóg nr. 20 frá 7. mars 1980, verður í §1 »januar 1980 = 100« broytt til: »januar 1983 = 100«.

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om pristal.**

**§1.** I lagtingslov nr. 30 af 21. maj 1975 om pristal, som ændret ved lagtingslov nr. 20 af 7. marts 1980, ændres i §1 »januar 1980 = 100« til: »januar 1983 = 100«.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkiugar:**
Galdandi lóg um prístal er løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975, har nýtt prístalsgrundarlag varð sett í gildi 1. juli 1975 við prístalinum 100.

Við løgtingslóg nr. 20 frá 7. mars 1980 varð prístalið pr. 1. januar 1980 flutt aftur til 100. Mett var, at tað gav eina rættari mynd av prísvøkstrinum, at prístalið við ikki alt ov longum millumbilum varð flutt aftur til 100. Pr. 1. januar 1980 var prístalið komið upp á 144,8.

Prístalið pr. 1. januar 1983 er nú komið upp á 145,9 ella umleið tað sama, sum tá tað varð flutt aftur seinast, og verður sostatt skotið upp at seta tað aftur til 100.

**Prístalsnevndin**

**Tórshavn** — **Nýtt**

| | Prístal 1. jan. 1980 | Prístal 1. apríl 1980 | Prístal 1. juli 1980 | Prístal 1. okt. 1980 | Prístal 1. jan. 1981 | Prístal 1. apríl 1981 | Prístal 1. juli 1981 | Prístal 1. okt. 1981 | Prístal 1. jan. 1982 | Prístal 1. apríl 1982 | Prístal 1. juli 1982 | Prístal 1. okt. 1982 | Prístal 1. jan. 1983 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Breyð og mjøl ..... | 91,3 | 96,1 | 100,3 | 104,5 | 109,8 | 114,4 | 117,5 | 123,1 | 124,4 | 125,4 | 127,5 | 129,8 | 133,3 |
| Kjøt ..... | 92,5 | 94,6 | 97,1 | 99,4 | 103,7 | 105,5 | 107,8 | 110,6 | 120,6 | 124,4 | 127,9 | 129,4 | 133,7 |
| Fiskur ..... | 109,4 | 111,9 | 115,5 | 119,1 | 120,7 | 123,0 | 127,4 | 133,4 | 136,5 | 136,8 | 139,6 | 143,9 | 152,1 |
| Mjólk, fitivørur, egg . | 85,8 | 88,6 | 93,6 | 99,4 | 103,3 | 105,2 | 107,0 | 111,9 | 115,5 | 117,9 | 118,0 | 120,5 | 122,3 |
| Frukt og grønmeti ... | 110,4 | 116,2 | 128,0 | 150,5 | 135,3 | 137,7 | 159,8 | 167,8 | 160,5 | 170,4 | 191,5 | 217,8 | 185,6 |
| Eplir ..... | 110,0 | 112,3 | 106,2 | 160,3 | 123,9 | 137,8 | 135,7 | 187,0 | 143,6 | 140,9 | 166,1 | 202,7 | 160,0 |
| Søtmeti ..... | 61,6 | 68,2 | 74,1 | 90,0 | 95,3 | 97,3 | 93,9 | 91,0 | 84,5 | 84,6 | 84,5 | 83,9 | 84,6 |
| Aðrar matvørur ..... | 107,0 | 110,1 | 112,7 | 116,7 | 123,9 | 126,7 | 132,0 | 137,2 | 140,7 | 143,9 | 147,6 | 154,5 | 158,8 |
| Drekkavørur ..... | 129,9 | 138,3 | 141,1 | 143,9 | 142,7 | 141,0 | 144,0 | 149,7 | 149,8 | 151,9 | 157,7 | 161,7 | 164,3 |
| Tubbak ..... | 96,9 | 98,0 | 99,4 | 101,3 | 102,8 | 103,9 | 105,1 | 107,3 | 103,4 | 106,5 | 107,4 | 109,3 | 111,1 |
| Rúsdrekka ..... | 107,1 | 107,1 | 111,8 | 103,3 | 103,3 | 106,8 | 110,6 | 110,6 | 111,1 | 111,1 | 115,5 | 115,5 | 121,8 |
| Klæðir, skógvar ..... | 92,2 | 93,2 | 94,7 | 95,7 | 98,7 | 99,1 | 101,4 | 103,3 | 105,9 | 109,3 | 110,8 | 111,9 | 114,3 |
| Vask og snák ..... | 104,1 | 107,3 | 111,7 | 115,9 | 119,1 | 120,9 | 125,1 | 128,2 | 130,2 | 133,5 | 137,6 | 140,8 | 145,1 |
| Búnyttur ..... | 89,3 | 91,2 | 94,7 | 97,2 | 99,4 | 101,3 | 105,1 | 106,5 | 109,3 | 110,4 | 114,2 | 115,7 | 117,1 |
| Olja og ravmagn ..... | 136,6 | 146,3 | 178,1 | 169,9 | 175,9 | 186,2 | 213,3 | 225,1 | 223,7 | 231,9 | 229,6 | 237,1 | 263,2 |
| Býli ..... | 98,9 | 102,2 | 110,4 | 113,1 | 118,3 | 120,3 | 123,4 | 129,3 | 134,6 | 135,1 | 140,2 | 141,6 | 145,3 |
| Aðrar vørur ..... | 101,7 | 104,1 | 106,2 | 106,6 | 107,7 | 113,1 | 118,0 | 122,8 | 123,1 | 123,1 | 129,9 | 137,0 | 137,1 |
| Prístalið ..... | 100,0 | 103,6 | 110,5 | 114,1 | 116,2 | 119,4 | 125,4 | 130,8 | 132,0 | 134,6 | 138,3 | 142,8 | 145,9 |

1. viðgerð 16. februar. Málið varð viðgjørt saman við nr. 62: Prístalsviðgerð av lønum. Bæði málini vórðu beind í fíggjarnevndina, sum 2. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð tann 16. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Í skrivi frá 15. februar 1983 hava Føroya Handverkarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Føroya Prentarafelag og Føroya Arbeiðarafelag mótmælt, at nomið verður við prístalsskipanina frá 1975 enn eina ferð. Feløgini krevja, at prístalsskipanin frá nú verður sett í sama lutfall sum í 1975, soleiðis at hvørt prístalsstig gevur 0,50 kr. frá 1. januar 1983 at rokna, og at hvørt stig útloysir eina prístalsviðbót.

Í nevnda skrivi verður borið upp á mál um fund við løgtingsumboð, og var fundur í fíggjarnevnd løgtingsins 2. mars 1983 kl. 10 við umboð fyri fylgjandi

Føroya Arbeiðarafelag,
Havnar Arbeiðsmannafelag
Føroya Prentarafelag
Havnar Handverkarafelag
Starvsmannafelagið
Tænastumannafelagið
Hagdeildin (Føroya landsstýri).

Umboðini fyri feløgini greiddu frá áskoðan teirra um fyriliggjandi løgtingsmál.

Fíggjarnevndarformaðurin Ivan Johannesen setti henda spurning til Karl Andreasen, fulltrúa á Hagdeildini.

Um hildið verður fram í 1983 við verandi prístali, ella um prístalið pr. 1. januar 1983 verður sett aftur til 100, hvørja ávirkan fær so hetta á inntøkurnar hjá vanligum fólki?

Svarað var, at við einum prísvøkstri upp á 10% skuldi munurin verið umleið kr. 2.000,- fyri árið.

Niðurstøðan hjá umboðunum fyri feløgini á fundinum varð, at

1) verandi prístal ikki má verða broytt, og
2) at nevnd verður sett at endurskoða grundarlagið fyri prístalinum.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Sami meiriluti er av tí áskoðan, at tá prístalsgrundarlagið ikki er endurskoðað síðani 1975, er orsøk til, at hetta verður gjørt, og setir fram soljóðandi

**I. Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at seta nevnd at endurskoða prístalsgrundarlagið.

---

Ein minniluti (Atli P. Dam) førir fram:

Árini 1980-81 og 82 hevur verið ein reallønarafturgongd hjá løntakarastættinum upp á minst 10%, bert orsakað av inflatiónini somu ár. Verða harafturat lagdar tær 50 millióna tollhækkingarnar í 1981, skattahækkingar frá inflatiónini og hækkingarnar í flutnings-, post-, telefon- og øðrum almennum gjøldum og tollhækkingarnar, sum fylgja prísvøkstrinum av brennievnum og øðrum vørum, so er valla ivi um, at reallønarafturgongdin seinastu tvey árini er so stór, at hon saman við gongdini í 1980 hevur tikið meginpartin av vøkstrinum sjeytiárini aftur frá løntakarabólkinum.

Í slíkari støðu er triðingsskerjing av endurgjaldinum fyri prísvøksturin ikki heppið búskaparligt tiltak, men heldur eitt skaðaskot.

Munurin ímillum at royna at tálma eini lønarhækking í einum tíðarskeiði við sterkum reallønarvøkstri og beinleiðis at fremja lønarniðurskurð í eini tíð, har reallønin minkar skjótt, er alstórur.

At fáa nakað minni lagt afturat og at taka burturav eini minkandi inntøku er hvørt sitt, og hitt seinna er nærum ógjørligt at laga seg til og makta hjá lág- og meðalinntøkufólki.

Hetta tykist landsstýrið als ikki at hava gjørt sær greitt. Jánkasligu grundgevingar landsstýrisins fyri uppskotinum sýna betur enn nakað annað. Tí sokallaða grundgevingin: »at harvið er prístalið betur í samsvar við prísgongdina«, er so einkisigandi, at skomm mátti verið fyri ábyrgdarpolitikkarar at smoykja so harðligt tiltak niður yvir løntakaran við so óprógvaðari grundgeving.

Her er ongin prógvførsla fyri, at tiltakið er neyðugt av samfelagsligum orsøkum. Einki prógv fyri, at búskaparligur bati liggur í uppskotinum. Einki prógv fyri, at kappingarføri okkara mennist

og heldur eingin meting um orkuna hjá vanligum løntakara at bera hesa byrðu afturat teim mongu, sum borgarliga »alternativið« hevur givið honum at bera, hevur skotið upp at leggja á hann og hevur í umbúna at koma við seinni.

Meðan landsstýrið sýnir slíka líkasælu, at tað als ongan ómak hevur gjørt sær fyri at rokna út týdningin av sínum harðrendu og asosialu tiltøkum, hava løntakarafeløgini sett upp eitt talsavn, sum vísir, at var reallønin í 1970 ájavnt við 100, so var hon í 1979 komin upp á 125, meðan hon við ársbyrjan 1983 varð lækkað aftur niður í 102. Ætlaða skerjingin trýstir so reallønina niðuraftur um 100. Tá her bert er innroknað skattahækking og inflatión aðru megin og lønarhækking og prístalsendurgjald hinumegin — meðan eingin rætting (korrektión) er gjørd fyri takst- og tollhækkingar — so er myndin av harðskapinum í framferð samgongunnar enn ljótari, enn hesi tøl prógva.

Tað mátti verið rímuligt krav, at landsstýrið, aðrenn hetta uppskot verður samtykt, leggur fram útrokningar, sum prógva ella mótprógva hesum tølum fakfelaganna, og at landsstýrið leggur fram metingar um beriorkuna hjá einum vanligum húsarhaldi at bera hendan niðurskurð afturat. Til tess hevur landsstýrið við síni hagfrøðiorku betri atstøður enn løntakarafeløgini, men so eiðasørt landsstýrið, fíggjarmálaráðharrin, løgmála- ella arbeiðsmálaráðharrin hava gjørt sær hendan lítla ómak.

Heldur ikki hava samgonguflokkarnir hirt at samráðast við feløgini frammanundan, so sum undanfarna samgonga tó gjørdi í 1980.

Aftan á framløguna hevur tó verið ein kvamsvísur fundur í fíggjarnevndini, har feløgini fingu at vita, at teir borgarligu uttan bøn fóru at lata skalvan leypa. Tey fingu at vita, at sakligu royndir teirra vóru til fánýtis, og kendu týðiliga, at høsnatráðurin, ið sambindur »alternativið«, er so veikur, at sjálvt ikki sakligar motiveringar kunnu broyta gjørda samgongusamtykt, uttan at hann slitnar, og hvørja ferð hann slitnar, fáa vit fleiri »fríggjarafløkjur« á løgtingspallin afturat teim mongu, leiktar eru frammanundan. Fundurin avdúkaði eisini, at hendan sokallaða samráðing við feløgini bert kom í lag eftir trýsti frá andstøðuni, men eisini, at alt var avgjørt frammanundan.

Ein av undanførslum samgongumanna er, at ætlaða tiltakið er ikki øðrvísi enn afturføringin í 1980.

Hetta er skeiv og villleiðandi samanbering, tí sum talsavn fakfelaganna sýnir, so merkti afturføringin í 1980 — saman við

ábyrgdarkendum lønaraftur∫aldni fakfelaganna í kreppustøðuni tá — ein reallønarniðurskurð í 1980 frá 125 til 120, meðan tvey tey næstu árini tóku meira aftur enn alt tað, sum øll framgongin í sjeytiárunum gav.

Hartil var støðan sovorðin í 1980, at løgtingið bert fyri at halda flotan í vinnu mátti nýta meira enn 30% av almennu fíggjarorkuni at stuðla veiðuflotanum. Í dag megna helst 15% hetta, og um skilamenn fyriskipaðu her á landi, rakk enn minni tal at halda hjólunum malandi.

Undanfarna samgonga megnaði hartil at javna neyðugu byrðarnar á nógv fleiri herðar og at fremja sosialt avvegaðar ábøtur til tey veikastu. Vísast kann til eykaskattin á háginntøkunum, eykaskattin á partafeløgum (bankum), skattalættan til láginntøkurnar og hækkaða barnafrádráttin.

Vent er í holuni nú!

Meðan bankarnir í hesum døgum leggja risatøl fram um yvirskotið, teir hava vunnið av óblúgvum rentum, sum løntakararnir hava knógvað undir, uttan at skattagjald teirra veksur samsvarandi, tó so nógv kann burturleggjast fyri møguligan miss av teimum, sum frammanundan fremja tær stóru avskrivingarnar, verður avlop (yvirskot) løntakarans skert í bein.

Meðan prís-, takst-, skatta- og tollhækkingar dyggiliga avmarka forbrúksmøguleikar løntakaranna, tykist forbrúk avskrivaranna og háinntøkumanna at vaksa so nógv, at handilsjavnahallið ár um ár setir met, og meðan uttanlandsfántøkurnar av hesum røkka stjørnuhæddum, orkar skjótt løntakarin valla at taka sær lán til útvegan av íbúð.

Borgarliga »alternativið« hevur eftir bert tveimum árum megnað at fremja størsta umbýtið av samfelagsorkuni (við løgmans orðum: lagkøkuni), sum í Føroyum nakrantíð er upplivað, tí sjálvsagt er allur vinningurin frá sjeytiárunum, sum løntakarin átti lut í, nú, tá hann hevur mist hann aftur, fluttur til onnur í samfelagnum.

Samstundis tykist samfelagsorkan ár fram í tíðina at vera bundin til tann stuðul og tey veðhald, sett eru til nøkur fá projekt — við avmarkaðum tali av arbeiðsplássum — hjá fáum einstaklingum.

Ongantíð fyrr er slíkt háð sýnt virkandi fjøldini sum nú, tá høgg eftir høgg tekur aftur tað, hon við bit og slit vann sær av teirri risaútbygging av okkara samfelag, hon var við til at fremja seksti- og sjeytiárini.

Er tað kappingarførið, samgongan vil styrkja, so má sigast, at hetta tiltak bøtir lítið, tí tá vit longu hava reallønarafturgongd,

mugu onnur tiltøk fremjast, skal kappingarførið styrkjast.

Eru tað forbrúksavmarkandi úrslit, sum minka um gjaldsjavnahallið, ið samgongan vil síggja, so má vísast til, at forbrúksmøguleikarnir hjá summum eru so stórir, at tiltøkini higartil hava verið nyttuleys.

Er tað gjalds- og rentabilitetsføri virkjanna, samgongan vil menna, so má svarast, at tey 2,5%'ini, sum løntakarafeløgini hava gjørt sáttmála upp á seinastu tvey árini, eru slíkt prógv um ábyrgdarkenslu teirra yvir fyri rakstri vinnunnar, at tey hava betri uppiborið enn hetta ásnasparkið afturfyri.

Eitt ávíst búskaparligt tiltak kann gera nyttu undir ávísum umstøðum, men tað kann gera beinleiðis skaða undir øðrum. Tað er hetta, sum ger seg galdandi í fyriliggjandi máli, tá so nógv virðismikið, sum uppbygt er eitt langt áramál, kemur í vanda fyri at falla.

Tann arbeiðsfrið, vinnulív okkara hevur verið fyri í mong ár, tað lønarhaldni, ábyrgdarfullir fakfelagsleiðarar hava sýnt í torførum árum og tað álitiskenda samstarv, verið hevur ímillum myndugleikar og arbeiðsmarknaðin — tað veri seg arbeiðsgevarar ella arbeiðarar — setir samgongan nú í váða fyri at fremja eitt tilvildarligt tiltak, sum onkur er komin í tankar um, hevur verið nýtt onkuntíð fyrr undir heilt øðrum umstøðum.

Tí tilvildarligt má fyriliggjandi uppskot skírast, »al den« tíð tað ikki eigur nakra grundgeving, ikki er liður í nakrari heild, bert rakar ein part av teim, ið solidariskt hava borið okkara samfelag, samstundis sum tað má metast at fáa álvarsligar og skaðiligar avleiðingar fyri okkara vinnulív.

Uppskotið er sett fram sum steinur oman á fleiri byrðar, samgongan hevur lagt á og eins lítið hevur torað at samráðst um sum hesa, sum onga nágreiniliga viðgerð hava fingið, líka so lítið sum hesum er ætlað.

So tilvildarligt er tiltakið valt, at heldur ikki arbeiðsgevararnir eru spurdir, um teir vilja seta alt álitissamstarv við løntakarafeløgini í váða fyri eitt lyftisbrot myndugleikanna, sum fakfeløgini kunnu meta avtalað spæl í millum arbeiðsgevarar og borgarlig..r.

Skal »ajourføring« prístalsins til 100 verða »í betri samsvar við prísgongdina«, er neyðugt, at viðbøturnar samstundis hækka. Tað er júst hetta, løntakarafeløgini halda seg eiga eitt lyfti um. Tí undanfarna samgonga lovaði at royna at bøta um endurgjaldið, so skjótt fíggjarliga rákið linkaði. Tí kann uppskot samgongunnar ikki samtykkjast, uttan so at prístalsjavningin verður í minsta lagi

90 oyru í staðin fyri tey 60 oyruni. Tá er einki endurgjald veitt fyri missin áður, men »eitt samsvar við prísgongdina« sett ígjøgnum. Hetta í sjálvum sær hevði tálmandi avleiðingar, tí prísjavningin varð seinkað, men beinleiðis missur varð so ikki varandi.

Hóast fyriliggjandi uppskot er prógv um, at »sparilandsstýrið« ikki megnaði setning sín, men fullkomiliga hevur mist tamarhaldið á búskapi landsins og í neyð síni roynir at fata løntakaran gjalda eina ferð enn, so hava løntakarafeløgini verið sera lítillátin í ynskjum í hesi søk.

Tey hava bert biðið um, at málið verður útsett í t.d. 3 mánaðir, meðan nevnd kannar eitt nýtt prístalsgrundarlag.

Minnilutin vil leggja afturat, at málið átti at verið útsett til ólavsøku, soleiðis at rímiliga kravið um, at onnur tiltøk eisini vórðu kannað, varð eftirlíkað. Hetta skuldi snúð seg um avskrivingar, skatt av bankayvirskotum, serskatt av háinntøkum, møgufigari broytan av skipanum, so ein »prístalsfamilja« altíð fekk fult endurgjald — og harvið lægri lønt »kompensatión« — meðan hægri lønir fingu skerda prísjavning, javning fyri broyting í útflutningsprísum o.m.a.

Tí verður mælt samgonguni til at taka málið út aftur í Tinganes, meðan slík kanning verður gjørd. Í øðrum lagi verður mælt tinginum til í minsta lagi at senda uppskotið aftur í fíggjarnevndina, soleiðis at hendan saman við pørtum arbeiðsmarknaðarins og landsstýrisins kann umhugsa skilabetri tiltøk til at broyta skeivu gongdina ímóti teirri knógvandi og lemjandi uttanlandsskuld, sum sitandi samgonga rekur føroyska samfelagið út í við atgerðarloysi sínum.

Gevur onnur viðgerð málsins onga undirtøku fyri slíkari breiðari kanning, mælir minnilutin — saman við Adolf Hansen og Ova Mikkelsen — til, at nevnd verður sett at viðgera nýtt prístalsgrundarlag, smb. uppskot til samtyktar frá einum samlaðum minniluta.

———

Minnilutin (Ove Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar til hetta mál:

Eftir áheitan frá andstøðuni í fíggjarnevndini var fundur tann 2. mars millum umboð frá flestu fakfeløgum og fíggjarnevnd viðvíkjandi hesum lógaruppskoti, og førdu tey fram m.a.:

At í 1980 og aftur nú við hesum uppskoti, so er tað arbeiðsfólkið, sum missir eina mest.

Í tølum er missurin frá 1975 til 1982 4,00 kr. pr. tíma, og gav tolllógin nú 2,00 kr. afturat, tilsamans 6,00 kr. minni pr. tíma.

Hetta gevur upp á ársbasis inntil nú ein miss upp á uml. 12.000 kr. frá 1975 og til 1983. Mælt varð tí frá at seta hetta lógaruppskotið í gildi.

Her mugu vit tingmenn eisini hava í huga, at gongdin hesi seinastu árini er vorðin tann, at støðugt minkandi arbeiði hevur verið at forvinna.

Ei heldur dugi eg at síggja nakra sum helst grundgeving í uppskoti landsstýrisins um, hví tað er neyðugt at føra prístalið aftur til 100.

Men verður uppskotið samtykt av samgonguni, og við einum inflatiónsvøkstri upp á 10% um árið, so missir arbeiðarafjøldin umí. 2.000 kr. um árið, og er hetta nakað, tey lægst løntu koma at føla. Ei heldur má gloymast, at miðalinntøkan hjá verkafólkum liggur um 70-80.000 kr. um árið.

Verður fyriliggjandi uppskot samtykt uttan nakað sum helst lyfti um kompensatión í lógarøkinum, so er prístalið og prístalsgrundarlagið heilt máað burtur fyri fjøldina av Føroya fólki.

Eisini eiga vit tingmenn at ásanna, at skattaprosentið á arbeiðsmannalønini í 1972 var í meðal 17,9%, meðan tað í 1982 er vorðið til 36,1%, og at realløntin — umsett í prosentum — í 1978 var 123%, men fall til 103 í 1982, takkað veri tí, at prístalið í 1980 varð sett aftur til 100. Fört hevur verið fram, at hetta, at lækka realløntirnar, er neyðugt, fyri at vit skulu verða kappingarførir mótvegis útheiminum. Uttan at hugsa um, at henda lækkan eina mest rakar tey lægst løntu, meðan tey yvirhøvur ikki nervar tey betru løntu í samfelagnum.

Hví skulu altíð tey lægst løntu fáa skyldina fyri vána kappingarføri?

Men orsøkin ikki vera tann, at ineffektivitetur valdar í nógvum virkjum kring landið? Tað veri seg flakavirki, skipasmiðjur og onnur virki og sostatt ikki skuld ella løn arbeiðsfólksins einans.

Eg meti, at fakfeløgini hava víst bæði hógv og stóra ábyrgd og altíð ásannað landsins fíggjarligu støðu og tryggjað arbeiðsfrið á arbeiðsmarknaðinum. Her hava vit næstan heimsmet.

Hvat er tað, ið skapar ófrið og rumbul á arbeiðsmarknaðinum? Er tað ikki júst ónøgd og vitan um misjavna og misbýti? Er tað hetta, tit vilja skapa enn meira enn nú? Verið varnir, tí tað kann koma at kosta landinum dýrt. Tí enn eiga vit her á landi bæði talu-, samráðingar- og verkfalsfrælsi.

Tit áttu at vitað, at tað er eitt mark fyri, hvussu leingi ein kann traðka ein hund á halan, áðrenn hann glepsar.

Í 1975, tá prístalið kom í gildi her á landi, vórðu fakfeløgini heilt náttúrligt tikin við upp á ráð, men vórðu skúgvað til víks í 1980 og

aftur nú í 1983. So statt er henda fjøld av Føroya fólki, sum prístalið nervar eina mest, at meta at vera vorðin sum ómælandi seyður á rætt.

Ynski fakfelaganna eru:

1. At ein skjótt arbeiðandi nevnd við umboðum fyri landsstýrið og fakfeløgini verður sett niður sum skjótast at útarbeiða eitt nýtt grundarlag fyri útrokning av prístalinum — eitt nýtt prístalsgrundarlag.
2. Og inntil hetta arbeiðið er gjørt og semja fingin í lag, stendur galdandi løgtingslóg um prístal í gildi.

Eg fari tí at heita á Føroya løgting um at ganga hesum demokratisku ynskjum á møti og seti tí saman við hinum báðum minnilutumum uppskot til samtyktar hesum viðvíkjandi.

---

Minnilutin (Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at tíðin er inni at endurskoða alt prístalsgrundarlagið og at gera eitt grundarlag, sum er tillagað til og samsvarar við føroysk viðurskifti. Sæst burtur frá danska statsstuðlinum, so eru tveir faktorar, sum gera seg galdandi viðvíkjandi príslegu og inntøkumøguleika. Teir eru príslegurnar á tí, ið vit innflyta, og tí, vit útflyta.

Síggjast má í eyguni, at Føroyar liva av tí útflutningi, vit hava, meðan vælferðin svingar við tí príslegu, sum okkara útflutningur til eina og hvørja tíð hvílir í. Tað heilt rætta var tí at havt eitt útflutningsprístal í staðin fyri sum nú eitt innflutningsprístal. Men ásannast má, at eitt tílíkt, tá útsvingini (hægstu innflutningsprísir/lægstu útflutningsprísir) vóru størst, vildu tey lægstløntu merkt ov hart, um enn tey hin vegin høvdu havt stórar fyrimunir av tí mótsetta útsvinginum. Vit mega tí finna aðrar leiðir at ganga, leiðir, sum eru rættvísar móti øllum. Núgaldandi prístal hevur teir eginleikar, at dýrari tær innfluttu vørurnar eru, tess hægri verður prístalið, og hetta uttan mun til, um grundarlagið undir okkara keypiorku, útflutningsvirðið, veksur ella minkar. Minnilutin er av teirri áskoðan, at tann prístalsskipanin, sum, sæð yvir eitt longri tíðarskeið, verður mest rættvís móti einstaklinginum, vinnulívinum og samfelagnum sum heild, og sum til eina og hvørja tíð útlíknaði samfelagságóðan millum tey, sum eru undirløgd prístalsskipanina, og tað eru tey flestu av okkum, og sum somuleiðis til eina og hvørja tíð eggjar teimum somu til at halda aftur, um og tá samfelagságóðin minkar, er eitt sokallað javnvágarprístal, ið virkar á tann hátt:

*at* prístalið fer upp, tá eindarútflutningsprísirnir fara upp, og fer niður, tá eindarútflutningsprísirnir fara niður, og
*at* prístalið fer upp, tá eindarinnflutningsprísirnir fara niður, og at prístalið samsvarandi fer niður, tá eindarinnflutningsprísirnir fara upp.

Við einum soleiðis virkandi prístali taka vit øll lut í samfelagságóðanum, tá hann er til staðar, meðan vit hinvegin øll megu spenna lívreimina inn, um hall er á okkara samhandli við aðrar.

Minnilutin setir saman við Atla P. Dam og Ove Mikkelsen fram soljóðandi

**II.Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at sett verður ein nevnd at útarbeiða eitt nýtt prístalsgrundarlag, og at lógin um prístal skal standa óbroytt, til álitið frá nevndini fyriliggur.

2. viðgerð 11. mars. Atkvøðugreiðsla 18. mars, §1 samtykt við 17 atkvøðum fyri, 12 ímóti, §2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. mars. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

F.L.j.nr. 1111-4. Lóg nr. 29 frá 28. mars 1983

# 65. Lán til frysti- og flakavirki

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um lán til frysti- og flakavirkir.**

§1. Landsstýrinum verður við góðkenning fíggjarnevndarinnar heimilað innanfyri eina lánsrammu uppá 30 mió. kr. at veita frysti- og flakavirkjum, ið eru, lán til útbygging og nútímansgerð. Av lánsrammuni verða tær 25 mió. kr. lagdar av til fløgur til viðgerð av svartkjafti.

*2. stk.* Einstaka lánið má ikki vera hægri enn 50% av ávísu fløguni, og skal tað vera tryggjað innanfyri 90% av metingarvirðinum fyri virkið.

*3. stk.* Lánini verða at renta við 9% p.a., afturgjaldingartíðin er 10 ár, og eru tey 2 fyrstu árini avdráttarfrí.

§2. Landsstýrinum verður heimilað at upptaka lán til útlánsveitingina.

§3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om lån til fryse- og filétanlæg.**

§1. Landsstyret bemyndiges til med finansudvalgets godkendelse indenfor en låneramme på 30 mio. kr. at yde værende fryse- og filétanlæg, lån til udbygning og modernisering. Af lånerammen bliver de 25 mio. kr. henlagt til investering til bearbejdning af blåhvilling.

*Stk. 2.* Det enkelte lån må ikke overstige 50% af den bestemte investering og skal være sikret indenfor 90% av vurderingen af anlægget.

*Stk. 3.* Lånene skal forrentes med 9% p.a., tilbagebetalingstiden er 10 år, og er de 2 første år afdragsfri.

§2. Landsstyret bemyndiges at optage lån til udlånsydelsen.

§3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Frysti- og flakavirki eru vanliga fíggjað við láni og partvíst studningi frá Direktoratet for Egnsudviling, men er hesin stovnur fyribils givin at fíggja, tá talan er um hækkan av framleiðsluorkuni hjá vanligu fiskavirkjunum í Føroyum.

Í einstøkum førum hevur Menningargrunnurin veitt lán til fiskavirki, men heldur landsstýrið, at Menningargrunnurin hevur aðrar so stórar uppgávur at fíggja, nevniliga ídnað, laksa- og sílaaling o.a., at teirra orka ikki røkkur til eisini at fíggja fiskavirki.

Tað eru nýliga bygd flakavirki, sum hava søkt Egnsudviklingsfonden og Menningargrunnin um lán, men eru umsóknirnar ikki gingnar á møti. Landsstýrið hevur givið tilsøgn um veðhald fyri láni, men eru hesi dýr bankalán. Landsstýrið heldur, at samlaða framleiðsluorkan á føroyskum flakavirkjum er ríkiliga stór, og ætlar ikki at stuðla víðari øking á hesum øki.

Tó heldur landsstýrið tað vera rætt, at nøkur virki, sum hava bygt og eru í ferð við at fyrireika smáútbyggingar, fáa partvísa fíggjan. Út frá hesum søkir landsstýrið løgtingið um játtan uppá 5 mió. kr. til hetta endamál.

Nógv hevur verið rætt um, og nakað er gjørt við, at útbyggjan av framleiðsluni úr svartkjafti til matna.

Ein verksmiðjutrolari hevur roynt í 2 ár. Innflutningsloyvi er givið til tann næsta.

Framleiðsluorkan á landi er nakað útbygd. Eitt stórt skip hevur seinastu tíðina fiskað svartkjaft til landingar av rávøru til virki á landi.

Umsókn er send landsstýrinum, aðrar umsóknir koma, um bygging av stórum skipi til veiðu av svartkjafti til framleiðslu á landi.

Landsstýrið heldur ikki, at úrslitini av framleiðslu úr svartkjafti á landi higartil eru nóg góð til at játta íløgur í nýggj svartkjaftavirki, hóast úrslitini eru betri nú enn áður.

Hin vegin heldur landsstýrið tað ikki vera rætt at bíða við at økja framleiðsluorkuna á landi, inntil framleiðslan gevur beinleiðis yvirskot uttan almennan stuðul.

Tá verandi flakavirki ikki undir einum fáa og kunnu fáa nóg mikið av botnfiski í mun til framleiðsluorkuna, og tá íløgupeningurin í verandi flakavirki fyri t.d. hvørja svartkjaftalinju er nógv minni enn í nýggj svartkjaftavirki, søkir landsstýrið løgtingið um játtan til saman við fíggjarnevndini 25 mió. kr. at læna verandi virkjum til íløgur í svartkjaftaframleiðslu.

Ætlanin er, at hesar 25 mió. kr. verða latnar sum ein partur av

samlaðu fíggjanini. Hin parturin væntast fíggjaður av Ídnaðargrunninum, Menningargrunninum og øðrum peningastovnum.

Við hesum tiltaki saman við øðrum tiltøkum ætlar landsstýrið at fáa meira gongd í svartkjaftaveiðu, -framleiðslu og -sølu við tí fyri eyga at útvega fleiri arbeiðspláss og at tilpassa samlaðu framleiðsluorku og rávørutilgongd.

1. viðgerð 16. februar. Málið varð viðgjørt saman við nr. 74: Løgtingslóg um svartkjaftavirki. Bæði málini vórðu beind í fíggjarnevndina, sum 18. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð 16. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 17. februar og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men hevur tó hesa viðmerking:

Heimildin er givin saman við fíggjarnevndini, sum til ta tíð eigur at gera neyðugar kanningar av projektinum, so sum meting um neyðuga fløgu í verandi virkir, kostnað fyri landskassan í mun til virkir bygd til endamálið, so sum part av virkinum »Dyllan« í Kollafirði. Eisini verður neyðugt vísandi til viðmerkingar í uppskotinum at gera gjølligar kanningar um, hvar fløgan hevur ætlaða ávirkan at skapa arbeiði, har tørvur er á hesum.

Møguleikin um at fáa niðurlagt verandi flakavirkir til býtis fyri svartkjaftavirkir eigur samstundis at verða kannaður.

Minnilutin (Atli Dam, Erlendur Patursson og Adolf Hansen) førir fram:

Vegna tess, at samgonguumboðini í fíggjarnevndini hava noktað fyri viðgerð av fyriliggjandi máli, er ógvuliga torført hjá andstøðuni at taka støðu til uppskot landsstýrisins.

Mikudagin 16. februar og hósdagin 17. februar gav løgmaður undir viðgerð av ymsum málum fleiri ferðir lyfti um, at einhvør tingnevnd — ja, einhvør tingmaður — skuldi fáa allar tøkar upplýsingar í einum hvørjum máli um eina hvørja málsviðgerð og eina hvørja umsitingarliga avgerð, ella snøgt sagt allar upplýsingar, sum kunnu geva støði fyri haldgóðum avgerðum.

Hósdagin 17. februar váttaði tingformaðurin frá formanssessinum, at Umboðsvald Føroya — løgtingið — hevur fyri neyðini, at andstøðan medvirkar — og tískil fær høvi til at medvirka — í lóggávuarbeiðinum.

Hetta skuldi verið so sjálvsagt eitt arbeiðslag, at slík váttan ikki var neyðug, men tá andstøðan var komin í ta støðu, at hon bert skuldi vera í tinginum, fyri at talið av tingmonnum kom upp um 16, so tingfundur kundi setast, var »representiva demokratiið« er vorðið ein so avskeplað mynd av fólkaræði, váttanir um hesar komu fram.

Kortini hildu lyfti løgmans og váttan formansins ikki hálvan dagin, tí tá fyriliggjandi uppskot kom til viðgerðar í fíggjarnevndini, varð noktað at leggja nakrar upplýsingar fram í málinum.

Málið snýr seg um heimild til játtan av svartkjaftalinjum at seta inn á verandi flakavirki — geografiskt avmarkað til Vestmanna og Skálafjørðin, t.v.s. hægst 4 í tali — og til fylgiíløgur í frystiorku og goymslurúm á hesum, tí varð frá andstøðuni biðið um, at tilfarið viðvíkjandi hesum ætlanum var tikið til viðgerðar. Hetta snúi seg um:

1. Kanningartilfar viðvíkjandi rentabiliteti.
2. Konkret projekt, søkt er um við tilhoyrandi rakstrarætlanum og kostnaðarmetingum.
3. Meting um rávørutilgongd og útbygging á skipasíðuni, herundir úrslit av royndum við partroling eftir svartkjafti við nótabátum.
4. Samanbering av teim projektum, uppskotið er grundað á, við projektini um spesialiserað virkir, sum tilætlað í Kollafirði og Gøtu.

Hetta varð alt noktað av formanni fíggjarnevndarinnar, ið kravdi, at endalig støða skuldi takast upp á standandi fót, hóast 1. tingviðgerð málsins hevði avdúkað, at ongar neyðugar upplýsingar vóru tøkar fyri tingmenn andstøðunnar.

Biðið varð eisini um, at fíggjarnevndin fekk høvi til at taka við:

1. Projekteringsfeløgini fyri flakavirkini og servirkini.
2. Fíggingarstovnarnar Ídnaðargrunnur og Menningargrunnur, sum landsstýrið metir skulu útvega helvtina av fíggingini.
3. Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og fiskifrøðingar, sum hava staðið fyri øllum royndum við svartkjafti og útbygging til svartkjaftaviðgerð.
4. Ídnaðarstovuna.

Eisini hetta varð noktað, men varð seinni — undir viðgerð av løgtingsmáli nr. 74 — játtað, at andstøðuumboðini kundu fáa hesar upplýsingar, tá landsstýrisuppskotið varð sent aftur til tingið.

Hertil varð samtykt, at um einar 2 mánaðir skuldi fíggjarnevndin fáa høvi til at tala við øll hesi fólk í sambandi við viðgerð av Kolla-

fjarðar- og Gøtuprojektinum, men sum nevnt ikki í sambandi við fyriliggjandi uppskot og tey projekt, sum tað byggir á.

Slík viðgerð av andstøðuni er so út av allari leið, so ódemokratiskt harðrend og óhøvisk, at hon tekur allar møguleikar frá andstøðuni til at kunna fremja haldgóðar metingar. Minnilutin mótmælir tí harðliga og heitir á løgmann og løgtingsformann, at teir sýna í verki, at lyfti og váttanir teirra eru eftirfarandi, soleiðis at saklig upplýsing kann fáast.

Júst tí tað snýr seg um at skera hvalin í rættan hátt í hesum máli, sum kemur at snúgva seg um milliardaløgur, er tað avgerandi, at allar upplýsingar eru tøkar, áðrenn avgerð verður tikin.

Vit hava so ofta hoyrt, at tað ber til at siga A'ið og B'ið, tí steðgast kann við C'ið, men hava A'ið og B'ið kostað 100 milliónir, er torført at sleppa undan C'num, sum kanska er fleiri hundrað milliónir, fyri at A og B ikki skulu fara fyri skeyti.

Fyri at varðveita allar møguleikar og fyri at fáa atstøður til nágreiniligari kanning millum 2. og 3. viðgerð setir minnilutin fram til uppskot landsstýrisins soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í §1, 1. stk. verður í staðin fyri orðini »flakavirkir, ið eru....« sett: »verandi flakavirkir og nýggj svartkjaftavirkir.«, upphæddin »30 mió. kr.« verður hækkað til »45 mió. kr.«, og upphæddin »25 mió. kr.« verður hækkað til: »40 mió. kr.« | I §1, stk. 1 ændres ordene: »fillétvirksomheder, som er ..« til: »eksisterende fillétvirksomheder og nye blåhvillingsfabrikker.«, beløbet »30 mio. kr.« ændres til »45 mio. kr.«, og beløbet »25 mio. kr.« ændres til »40 mio. kr.«. |

Harvið eru so møguleikar fyri at velja ímillum útbyggingarhættir ella at fremja ymsar útbyggingarhættir samstundis. Tí um so er, at landsstýrisins meting er rætt, at 25 mió. kr. røkka til eina fyribils útbygging av verandi flakavirkjum, so skuldu eyka 15 mió. kr. nøktað fyribilstørvin í sambandi við bygging av spesialvirkjum.

Men sum tað er frásagt, er minnilutanum noktaður møguleiki fyri at meta um, um landsstýrisins uppskot er nóg gott ella ikki.

8. mars løgdu løgtingslimirnir Petur Reinert, Karin Kjølbro, Erlendur Patursson og Hans M. Joensen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Einki er komið fram hvørki undir fyrstu ella aðru viðgerð ella undir nevndarviðgerð í fíggjarnevndini, sum bendir á, at henda ætlan, sum hetta lógaruppskot ber í sær: at arbeiða svartkjaft á blandingsvirkjum er rætta leiðin at ganga.

Tvørtur ímóti er mangt, sum bendir á, at so er ikki.

Tað er heilt ivaleyst, at slíkum blandingsvirkjum koma at tørva munandi fleiri fløgur enn nakrar linjur at skera svartkjaft við. Frystiorka teirra er í flestu førum ov lítil, allarhelst er eisini ov lítið rúmsátt, so leggjast má afturat. Og ilt er at síggja, hvussu vit reint rakstrarliga skulu skilja tey ymsu fiskasløgini hvørt frá øðrum fyri at fáa røttu myndina fíggjarliga av svartkjaftaarbeiðinum.

Harumframt hevði allarhelst eingin svartkjaftur verið arbeiðddur á nøkrum blandingsvirki allan seinasta mánaðin, tá so nógvur fiskur annars er komin upp á land. Og vísir hetta okkum greitt, at hæddirnar í fiskiskapi eftir botnfiski og svartkjafti falla saman.

Tann peningur av hesum 30 mill. kr., sum er avsettur til nútímansgerð av vanligum flakavirkjum, er 5 mill. kr. Hetta talið er láturliga lágt sett, tí tørvurin á fløgum av hesum slagi runt um í landinum má metast til onkunstaðni millum 40-60 mill. krónur.

Tann royndarfiskiskapur, sum hevur verið eftir svartkjafti í vetur við parti av okkara kraftblokkaflota, hevur stuttliga víst, at hesi skip við ávísum ábótum eru væl egnað til at fiska svartkjaft til matna.

Vit halda, at tað hevur skund at fáa veruliga gongd á at gera svartkjaft til matna eisini uppi á landi og seta tí hetta broytingaruppskot fram:

**§1.** Av lánsrammuni verða tær 15 mió. kr. lagdar av.

**§2.** Eitt av núverandi flakavirkjum, sum liggur høgliga fyri, verður umskipað til svartkjaftavirki burturav. Til hetta endamál verður Føroya Landsstýri heimilað at nýta peningauppheedd upp til 15 mill. krónur.

Aðrar 15 mill. krónur verða nýttar til rationaliseringar av núverandi fiskavirkjum.

2. viðgerð 2. mars, atkvøtt varð, um málið skuldi aftur í nevnd. Við 17-0 atkvøðum varð samtykt, at tað ikki skuldi aftur í nevnd. Atkvøðugreiðsla 4. mars.

3. viðgerð 8. mars. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum. Broyting til § 1 fall við 13-0 og til § 2 fall við 14-0.

F.L.j.nr. 1413-3. Lóg nr. 39 frá 14. apríl 1983.

# 66. Europeiskur sáttmáli um adoptión

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði lóganevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur tann 4. januar 1983 skrivað tinginum:

»Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at kunngerð av europeiskum sáttmála frá 24. apríl 1967 um adoptión av børnum verður lýst at galda í Føroyum.

Sáttmálin er ratifiseraður av Danmark 23. august 1979, og skuldi einki verið til hindurs fyri, at hann eisini verður lýstur at galda í Føroyum, tá adoptiónslógin við seinni broytingum er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 552 frá 8. oktober 1982.

Fremsta endamálið við sáttmálanum er at tryggja, at adoptiónir í sáttmálalondunum verða framdar eftir somu prinsippum, soleiðis at adoptivbørn í so stóran mun sum gjørligt at sleppa undan seinni rættaróvissu.«

Málið varð beint í lóganevndina til viðgerðar. Lóganevndin hevur viðgjørt málið og setir fram fylgjandi

**Uppskot til samtyktar**

Kunngerð av europeiskum sáttmála frá 24. apríl 1967 um adoptión av børnum verður lýst at galda í Føroyum.

2. viðgerð 18. februar. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 604-1.

# 67. Lóg um kredittkeyp

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at ríkislóg nr. 275 frá 9. juni 1982 »om køb på kredit« við heimild í §43 verður sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan við hesum

**broytingum**

1. Í §18 verður »20%« broytt til »45%«, og seinasta punktum gongur út.
2. Í §20, stk. 3 verða orðini »Lov om aktieselskaber §159 og lov om anpartsselskaber §129« strikað.
3. Í §38, stk. 1 verða orðini »med tillæg på 2%« strikað.
4. Í §40, stk. 4, verður orðið »anpartsselskab« strikað.
5. Í §41, stk. 2, verða orðini »efter anmodning fra forbrugerombudsmanden« strikað.
6. Í §41, stk. 4, verður orðið »anpartsselskab« strikað.

**Viðmerkingar:**

Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 275 frá 9. juli 1982 »om køb på kredit« verður lýst at galda í Føroyum.

Lógin kann eftir §43 setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við teimum broytingum, sum serligu føroysku viðurskiftini tala fyri.

Lógin avloysir avgjaldingarlógina frá 1954 og kemur umframt at umfata alt keyp/sølu av leysafæ upp á kreditt. Keyp undir 1.000 kr., og har keypspeningurin skal gjaldast innan ein mánað, kemur ikki undir lógina.

Endamálið við lógini er at styrkja støðuna hjá kredittkeyparum, serstakliga har hesin er ein vanligur brúkari. T.d. skal skrivliga upplýsast fyri keyparanum, hvat vøran kostar kontant, hvat kredittkostnaðurin er, tey einstøku gjøldini, og hvat kostnaðurin tilsamans er fyri vøruna við at keypa upp á kreditt.

Eftir nýggju lógini verður útgjaldingin fyri keyp upp á avgjalding 20% eins og nú, meðan útgjaldingin í Føroyum er 15%, av tí at allar broytingar í gomlu avgjaldingarlógini ikki eru settar í gildi í Føroyum. Einki skuldi verið til hindurs fyri, at vit í Føroyum hava eitt hægri útgjaldingarprosent enn t.d. 20%, um vit ynskja at avmarka nýtsluna av dýrum innfluttum lutum, og hevur landsstýrið skotið hetta upp við í § 18 at broyta »20%« til »45%«.

1. viðgerð 16. februar. Uppskot um, at málið skuldi beinast í sosialu nevndina, fall við 7-0 atkvøðum. Málið varð síðani beint í løganevndina, sum 31. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 14. februar 1982 og við 1. viðgerð beint í løganevndina.

Lógarreglur um keyp uppá borg finnast í dag bert í lógini um avgjaldshandilskeyp. Henda lóg er bert galdandi fyri avgjaldshandilskeyp, har seljarin hevur tikið ognarfyrivarni í tí selda. Fyriliggjandi lóg um kredittkeyp skal, hvat hesum keypi viðvíkur, avloysa galdandi lóg um avgjaldshandilskeyp. Lógin er tó ikki bert avmarkað til tílíkt keyp, men fevnir í høvuðsheitunum um alt keyp av leysafæ uppá borg, herundir sokallað kontokeyp. Undantikin verða tó stuttfreistað keyp uppá borg av dagligdags vørum, har peningurin skal rindast í seinasta lagi í mánaðinum aftan á keypið. Heldur ikki er lógin galdandi fyri keyp hjá vinnurekandi av vørum til víðari sølu og keyp av tilfari, ið eitt vinnuvirki nýtir í vinnuni.

Endamálið við lógini er at styrkja støðuna hjá kredittkeyparum, serstakliga har hesin er vanligum brúkari.

Reglurnar í lógini kunnu ikki frávíkjast til skaða fyri eitt forbrúkarakeyp og í øllum avgjaldshandilskeypi. Treytirnar í standardsáttmálum og øðrum avtalum, ið avmarka rættindini hjá keyparum eftir lógini, tá talan er um hesi kredittkeyp, eru ógyldigar. Tá ið talan er um annað vinnuligt keyp enn avgjaldshandilskeyp, hava partarnir sama avtalufrælsi sum higartil.

Fyri at tryggja, at brúkarin kann taka sína avgerð um keyp uppá borg á røttum grundarlagi, skal seljarin geva keyparanum skrivliga upplýsing um ymisk viðurskifti, t.d. kontantprís og samlaðu rentuupphæddina av at keypa vøruna uppá kreditt.

Eftir núgaldandi lóg kann seljarin, ið vil hava trygd í teimum seldu lutunum, taka ognarfyrivarni ella fáa tinglýst undirpant í seldu lutunum. Hevur seljarin valt seinnu loysnina, er keyparin ikki vardur eftir serligu reglunum í avgjaldshandilslógini, eins og ongar treytir verða ásettar um ávísa minstuútgjalding.

Eftir nýggju lógini kann seljarin ikki í sambandi við keyp ella útflýgging, tá talan er um brúkarakeyp, taka pant í lutum sum trygd fyri, at keypari heldur sínar skyldur, og harvið sleppa undan kravinum um minstuútgjalding.

Seinastu árini hevur leasing verið nógv nýtt í vinnulívinum til útvegan av arbeiðsamboðum og maskinum í staðin fyri sjálvfígging. Á vanliga forbrúkaraøkinum verður ieasing so at siga bert nýtt í sambandi við leigan av sjónvarpi. Ein kanning, ið hevur verið gjørd í Danmark í sambandi við nýggju lógina um kredittkeyp, vísir, at tørvur ikki skuldi verið á serstøkum reglum um leasing.

Av øðrum broytingum til vernd av brúkarakeyparum kann nevnast, at seljarin ikki kann móttaka vekslar samsvarandi keypsprísinum og harvið avskera keyparan frá at gera manglar galdandi, og at seljarin bert kann søkja fulnað í tí selda lutinum við at taka hann aftur, og um afturtikni lutin er minni verdur enn krav seljarans, kann hann vanliga ikki krevja restina goldna av keyparanum.

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum skal útgjaldingin verða 45%, fyri at ognarfyrivarni skal kunna gerast galdandi. Kravið um útgjalding er bert galdandi fyri brúkarakeyp og ikki, sum eftir núgaldandi lóg, fyri øll keyp við ognarfyrivarni. Sostatt verður eftir uppskotinum einki til hindurs fyri, at ein vinnurekandi kann keypa lastbilar, arbeiðsamboð og onnur vinnutól uppá avgjaldshandilssáttmála uttan nakra minstuútgjalding.

Undir viðgerðini varð málið sent Brúkarafelagnum og bankunum til ummælis. Einstøk av hesum ummælum eins og skriv, sum nevndin hevur móttikið frá Havnar Detailhandlarafelag, øðrum handlandi í Havn og Felagnum fyri Bilhandlarar og Verkstaðseigarar, eru viðheft málinum sum skjøl.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og 2 minnilutar.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Aguar Nielsen og Øssur Dam Jacobsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jona Henriksen) tekur undir við, at nýggja lógin verður sett í gildi í Føroyum, og at útgjaldingarprosentið verður 20%. Sostatt setir hesin minnilutin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir uppskotið frá landsstýrinum við undantaki av broyting 1.

Minnilutin (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 1. juni. Uppskot landsstýrisins pkt. 1 fall við 16-0, pkt. 2-6 samtykt við 22-0 atkvøðum.

*Sí skjal 12 A*

F.L.j.nr. 603-1.

# 68. Keyp av helikoptara

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um keyp av helikoptara.**

**§1.** Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at keypa ein helikoptara og læna neyðugan pening til keypið.

*2. stk.* Keypsprísurin fyri helikoptaran skal góðkennast av fíggjarnevndini.

**§2.** Strandfaraskip landsins hevur raksturin av helikoptaranum um hendi.

**§3.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om køb af helikopter.**

§1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at købe en helikopter og at låne det nødvendige beløb til købet.

*Stk. 2.* Købsprisen for helikopteren skal godkendes af finansudvalget.

§2. Landets Kystfart administrerer driften af helikopteren.

§3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Eftir at hava havt royndarflúgving við »Tyrlu« í fjør var tað greitt, at tað bæði er neyðugt og møguligt við helikoptaraflúgving til tey plássini í landinum, sum ikki hava nóg gott ferðasamband.

Helikoptarin, sum hugsað verður um at keypa, er væl minni enn Tyrla og tí bíligari at reka. Mett verður, at hesin kortini kann røkja tann mest neyðuga flutningin av fólki og góðsi, eisini sjúkraflutning, til og frá umrøddu plássum.

Tað verður á strandferðsluøkinum, sum roknast má við, at tann størsta nýtslan verður, og tí verður rátt til, at ein deild verður stovnað undir Strandferðsluni, sum skal reka helikoptaran fyribils.

Viðmerkjast kann, at Strandfaraskip Landsins væntandi kemur at hava munandi inntøkur frá leiguni av Teistanum, sum ikki eru tiknar við á fíggjarætlanini, og tí verður helst ikki neyðugt við hægri játtan til Strandfaraskip Landsins.

1. viðgerð 16. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð tann 16. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 17. í s.m.

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Anfinn Kallsberg, hevur á hesum fundi givið fíggjarnevndini frágreiðing og upplýsingar um teknisk og fíggjarlig viðurskifti í málinum.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Adolf V. Hansen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Erlendur Patursson) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 2. mars. §1 varð samtykt við 24-0, §2 við 23-0.

3. viðgerð 8. mars. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1820-28. Lóg nr. 37 frá 14. apríl 1983.

# 69. Val av landsstýrismanni

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Pauli Ellefsen, løgmaður, fram

**Løgtingsmál nr. 69/1982: Val av landsstýrismanni**

Eftir viðlagda skrivi dagfest 21. januar 1983 søkir Olaf Olsen, landsstýrismaður, um av persónligum orsøkum at verða loystur úr starvinum skjótast møguligt.

Á løgtingsgfundi 7. februar 1983 las løgtingsformaðurin upp tilsvarandi skriv til sín og segði samstundis frá, at Olaf Olsen var farin úr starvinum.

Vísandi hertil og til §6 í løgtingslóg um umboðsvald Føroya skjýtur løgmaður upp, at Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, verður valdur landsstýrismaður fyri ta tíðina, ið eftir er av valskeiðinum.

Pauli Ellefsen
løgmaður

Pauli Ellefsen
løgmaður
Tórshavn

Í Tinganesi, 21. januar 1983

Av persónligum orsøkum søki eg hervið at verða loystur úr starvi sum landsstýrismaður skjótast gjørligt.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

Eftir uppskoti frá løgmanni varð Anfinn Kallsberg valdur til landsstýrismann eftir Olaf Olsen við 17-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 202-2-23.

# 70. Løgtingsmál um fríhandilsøkir

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Tórbjørn Poulsen, landstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um fríhandilsøkir.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at seta á stovn og reka fríhandilsøki.
*2. stk.* Landsstýrinum verður heimilað at loyva felagsskapum at seta á stovn og reka fríhandilsøki.
*3. stk.* Sum fríhandilsøki er at skilja øki fram við strond ella inni á landi, har útlendskar ella innlendskar vørur verða innfluttar, lagdar á goymslu og/ella viðgjørdar uttan tollgreiðslu.

**lagtingslov om frihandelszoner.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at etablere og drive frihandelszoner.
*2. stk.* Landsstyret bemyndiges til at meddele fællesskaber tilladelse til at etablere og drive frihandelszoner.
*3. stk.* Som frihandelszone regnes et område, der grænser op til kyst eller er beliggende i landet, hvor udenlandske eller indenlandske varer kan importeres, oplagres og/eller forarbejdes uden toldklarering.

*4. stk.* Tá vørur verða fluttar frá frihandilsøki til innland, verða vanlig tollgjøld og onnur serliga ásett gjøld at rinda, meðan flutningur til útlond fer fram undir eftirliti, men uttan rindan av tollgjøldum.

§2. Landsstýrinum verður heimilað at rinda neyðugar stovningar- og rakstrarútreiðslur, um landsstýrið ger nýtslu av heimildini eftir § 1, stk. 1 í hesi lóg.

§3. Landsstýrið ásetir við kunngerð nærri reglur viðvíkjandi stovnseting og rakstri av frihandilsøkjum, ið sett verða í verk sambært § 1, stk. 1 og stk. 2 í hesi lóg.

§4. Landsstýrið fær heimild til at loyva tollgjøld afturrindað fyri vørur, ið útfluttar verða, tá ið atstøðurnar við eftirkannan finnast at vera fyri tí.

§5. Brot ella brotroynd móti hesi lóg ella reglum, sum eru givnar eftir henni, kemur undir bót, um so er, at í tolllógini ella í lóggávuni annars ikki er fyrisett serstøk sekt.

§6. Um upptøku galda reglurnar í almennu lóggávuni smbr. § 75 f.f. í »borgerlig straffelov.«

*4. stk.* Når varer transporteres fra frihandelszone til indland, erlægges sædvanlig told og andre særlige afgifter, medens eksport til udland foretages under kontrol, men uden erlæggelse af toldafgifter.

§2. Såfremt landsstyret gør brug af bemyndigelsen i henhold til § 1, stk. 1 i denne lov, får landsstyret bemyndigelse til at afholde de nødvendige stiftelses- og driftsomkostninger.

§3. Landsstyret foreskriver i bekendtgørelse nærmere regler for etablering og drift af frihandelszoner, der stiftes i medfør af denne lov § 1, stk. 1 og stk. 2.

§4. Landsstyret bemyndiges til at tillade, at betalt told refunderes for varer, der udføres, når omstændighederne efter foretagen undersøgelse findes at tale derfor.

§5. Overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af nærværende lov eller de i medfør af loven givne forskrifter straffes med bøde, for så vidt der ikke i toldloven eller i lovgivningen i øvrigt er fastsat særlig straf herom.

§6. Om konfiskation gælder lovgivningens almindelige regler, jfr. borgerlig straffelov § 75 f.f.

**§7.** Umsiting og eftirlit við loyvum givin við heimild í §1 í hesi lóg verða løgd til tollvaldið.

**§8.** Tær í §§31 og 32 í verandi tolllóg ásettu reglur eru eisini galdandi fyri hesa lóg.

**§9.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**§7.** Administration og kontrol med bevillinger, der er meddelt med hjemmel i §1 i denne lov, foretages af toldvæsenet.

**§8.** De i §§31 og 32 foreskrevne regler i gældende toldlov, finder også anvendelse, hvad angår denne lov.

**§9.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur m.a., at arbeitt skal verða fyri at fáa transitt- og frígoymslu setta á stovn.

Hetta, at skipa fyri frígoymslu í Føroyum, er eitt gamalt ynski hjá vinnulívinum, og málið hevur áður verið til viðgerðar á tingi.

Seinru árini er spurningurin um transitt- og frígoymslu aftur vorðin aktuellur, og frá fleiri av okkara vinnulívsgreinum hevur verið gjørt vart við, at tíðin er komin at fáa málið framt.

Vaksandi ferðamanna- og farmaskipaferðsla um okkara leiðir saman við handilsligum møguleikum hjá føroyskum fyritøkum ger tað ráðiligt at fara undir tiltakið nú. Heppin endurútflutningur og møgulig meirtilvirkan av ávísum vørum kann veita arbeiðspláss, nøra um vinning og vinna okkum ein marknað uttanlands.

Lógin er at skilja sum ein heimildarlóg, sum loyvir landsstýrinum at regulera fyri transitt- og frígoymslu og í serligum føri at loyva tollendurgjald fyri útfluttar vørur. Lógin er tillagað teim mest nútímans skipanum, vit kenna aðrastaðni.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð tann 17. februar beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundum, serliga tann 21. apríl

1983, har umboð fyri Heilsølumannafelagið, Iðnaðarfelagið og tollvaldið møttu og høvdu viðmerkingar til uppskot landsstýrisins. Eisini var landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Tórbjørn Poulsen á fundi.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Adolf V. Hansen og Asbjørn Joensen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, men er av teirri áskoðan, at reglur eiga at verða ásettar soleiðis, at vørur, ið verða uppskipaðar í Føroyum til flutning til annað land — transitt — sleppa undan innflutningsgjøldunum eftir ávísum treytum, ið tollvaldið ásetir, og somuleiðis eigur heimild at verða útvegað fyri, at tá vørur verða endursendar ella endurútfluttar, kann innflutningsgjald, serligt innflutningsgjald og eykainnflutningsgjald verða afturrindað. Eisini tá talan er um vørur, sum framleiddar eru í Føroyum, verða útfluttar. Nevndi meiriluti setir tí fram soljóðandi

## Uppskot til

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í §6, 1. stk. verður skoytt uppí:
»Vørur, ið verða uppskipaðar í Føroyum til víðari flutning til annað land (transitt), sleppa undan innflutningsgjaldi, serligum innflutningsgjaldi og eykainnflutningsgjaldi eftir nærri av tollvaldinum ásettum treytum.«

2) §8, stk. 1 verður orðað soleiðis:

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om indførselsafgifter m.v.**

§1. I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgifter m.v. foretages følgende ændringer:

1) I §6, 1. stk. tilføjes:
»Varer, der oplosses på Færøerne til videre transport til andet land (transit), er fritaget for indførselsafgift, særlig indførselsafgift og ekstra indførselsafgift efter nærmere betingelser, der fastsættes af toldmyndighederne.«

2) §8, stk. 1 affattes således:

»Innflutningsgjald verður vanliga ikki afturrindað. Tó kann tollvaldið kunna skipa soleiðis fyri, at innflutningsgjald, serligt innflutningsgjald og eyka innflutningsgjald kann verða afturrindað fyri vørur, ið verða endursendar ella endurútfluttar, tá ið umstøðurnar — við eftirkanning í hvørjum einstøkum føri — tala fyri hesum. Eftir somu treytum fær tollvaldið heimild til at endurrinda umrøddu gjøld, tá vørur, sum eru framleiddar í Føroyum, verða útfluttar.«

§2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Samstundis fer løgtingslóg nr. 35 frá 12. juni 1962 um broyting í tolllógini úr gildi.

»Indførselsafgift refunderes i regelen ikke. Dog kan toldmyndighederne indrømme tilbagebetaling af indførselsafgift, særlig indførselsafgift og ekstra indførselsafgift for varer, der returneres eller reeksporteres, når omstændighederne efter anstillet undersøgelse i hvert enkelt tilfælde taler herfor. Efter samme betingelser får toldmyndighederne hjemmel til at refundere omtalte afgifter, når varer, der er fremstillet på Færøerne, eksporteres.«

§2. Denne lov træder i kraft straks. Samtidig træder lagtingslov nr. 35 af 12. juni 1962 om ændring i toldloven ud af kraft.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen og Svend Åge Ellefsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. mai. Upprunaliga uppskotið § 1 fall við 15-0 atkvøðum. Uppskotið frá meirilutanum, § 1, 1. og 2. stk., samtykt við 23-0.

3. viðgerð 18. mai. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1101-18. Lóg nr. 76 frá 4. aug. 1983.

# 71. Broyting í skattalógini

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í skattalógini.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í §4 verður sett sum nýtt nr. 14)
»14) renta av ov nógv goldnum skatti sambært §87, 3. stk. og endurgoldin renta sambært §2 í kunngerð nr. 31 frá 30. apríl 1964 um skattainnkrevjing.«

2) Í §9, 1) verður skoytt uppí:
»Tó ikki renta sambært §87, 3. stk. í hesi lóg.«

**lagtingslov om ændring i skatteloven.**

**§1.** I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I §4 tilføjes som nyt nr. 14)
»14) renter af for meget betalt skat iflg. §87, stk. 3, og refunderede renter iflg. §2 i bekendtgørelse nr. 31 af 30. april 1964 om opkrævninger af skatter.«

2) I §9, 1) tilføjes:
»Dog ikke rente iflg. §87, stk. 3 i denne lov.«

3) Í § 19 A, 1. stk. a, 2. punktum verða orðini »5.000 kr. um mánaðin« broytt til »15.000 kr. árliga.«

3) I § 19 A, 1. stk. a, 2. punktum ændres »5.000 kr. pr. måned« til »15.000 kr. årlig«.

4) Í § 26, 6. stk. verður aftan á 1. punktum skoytt uppí:
»Tó ikki renta sambært § 82, 1. stk. í hesi lóg.«

4) I § 26, stk. 6 tilføjes efter 1. punktum:
»Dog ikke renter iflg. § 82, stk. 1 i denne lov.«

5) Í § 33, 2. stk. verður aftan á 1. punktum skoytt uppí:
»Tó ikki renta sambært § 82, 1. stk. í hesi lóg.«

5) I § 33, stk. 2 tilføjes efter 1. punktum:
»Dog ikke renter iflg. § 82, stk. 1 i denne lov.«

**§ 2.** Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1983/84.

**Viðmerkingar:**

Broytingarnar í hesi lóg føra við sær, at frá komandi skattaári kann renta av ov seint goldnum skatti ikki meira dragast frá á sjálvuppgávuni eins og góðskrivað renta av skatti, goldin áðrenn gjaldsfreist, ikki meira skal takast við í inntøkuuppgerðina til skattavaldið.

Orsøkin til, at landsstýrið hevur sett uppskot fram um nevndu broyting í skattalógini er tann veruleiki, at hækkaða útlánsrentan hjá føroysku peningastovnunum seinastu árini hevur ført við sær, at nú er bíligari at skylda skatt enn at taka lán úr okkara peningastovnum. Landsstýrið metir, at tann hækking í nettorentuni, sum tað ber í sær, at goldin renta ikki meira verður loyvd frádrigin í skattauppgerðini, vil føra við sær betri javnvág í hesi viðurskifti aftur. Avleiðingarnar verða so vónandi minni skattaeftirstøður eins og størri áhugi at gjalda álíknaðan skatt áðrenn gjaldsfrest.

Broyting nr. 3 í hesum lógaruppskoti gevur øllum, sum eru undir útbúgving uttanlands, og sum uppihalda seg stytri tíð í Føroyum, t.v.s. ikki meira enn 90 dagar árliga, ein fastan frádrátt uppá 15.000 kr. árliga í staðin fyri tær higartil galdandi 5.000 kr. pr. mánað. Umframt, at hetta uppskotið verður lættari at umsita enn higartil galdandi reglur, ber uppskotið fyrst og fremst í sær, at betri javnvág verður millum

persónar undir útbúgving uttanlands og persónar undir útbúgving í Føroyum, hvat viðvíkir teirri minstuupphædd, ið kann forvinnast, áðrenn skattur skal gjaldast av inntøkuni.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í skattanevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 14. februar 1983 og undir fyrstu viðgerð 17. í s.m. beint í skattanevndina.

Ein samd skattanevnd mælir til at samtykkja litra 3 í uppskotinum og mælir til, at litra 3 fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

Skattanevndin mælir frá at samtykkja litra 1, litra 2, litra 4 og litra 5 við teirri grundgeving, at hetta mál er við í nýggja uppskotinum til samtíðarskattin.

2. viðgerð 26. apríl. Broytingaruppskot til litra 3 samtykt við 32-0.

3. viðgerð 2. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 430-12-36. Lóg nr. 51 frá 20. mai 1983.

# 72. Løgtingslóg um bygdamenning

Ár 1983, mánadagin 14. februar legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um bygdamenning.**

**§1.** Hvørjum tí skattgjaldara, ið setur parta- ella lutapening í vinnulívsfeløg í vinnuliga tilafturskomnum bygdum, og sum hava tað til endamáls at fremja vinnulív bygdanna, skal vera heimilt at draga frá skattskyldugu inntøku sína tilsvarandi upphædd, tó onga tíð meira enn 10.000 kr. árliga.

*2. stk.* Selur parta- ella lutaeigari part ella lut sín innan fyri 7 ár, verður hann skattskyldugur av upphædd, ið svarar til upphæddina, ið áður var skattafræls.

**§2.** Eftir tilmæli ídnaðarstovunnar og menningargrunsins kunnger landsstýrið skrá yvir tær bygdir, ið koma undir §1 í hesi lóg.

§3. Landsstýrinum er heimilt saman við fíggjarnevndini úr landskassanum at seta upp í 20% av parta- ella lutapeninginum í tey bygdavinnulívsfeløg, ið umrødd eru í § 1 í hesi lóg.

§2. Í slíkum førum skal landsstýrið í minsta lagi hava ein nevndarlim í viðkomandi felagi.

§4. Eftir samráð við fíggjarnevndina setir landsstýrið í reglugerð nærri fyrimæli um útinning lógarinnar.

**Viðmerkingar:**

Av broyttum vinnulívsmynstri hevur m.a. staðist tað, at mong bygdin, ið áður hevði hampilig vinnulívskor, er komin til afturs í menning við minkandi vinnulívsmøguleikum og minkandi fólkatali. Ein støðug miðsavning og flótti fólks frá hesum bygdum er farin fram hesi seinastu árini.

Tjóðveldisflokkurin heldur hesa gongd vera skeiva og metir, at tað eigur at vera ein tátturin í búskaparpolitikki okkara sum mest at varðveita hesar bygdir og at stimbra menning teirra. Ein høvuðstreytin fyri hesum er at skapa vinnu- og inntøkulíkindi í hesum bygdum.

Eftir upp-skotinum skal tað vera skattgjaldara heimilt at draga frá skattskyldugu inntøku síni ávísa upphædd, ið svarar til tann pening, ið hann setir sum parta- ella lutapening í vinnulívsfeløg í vinnuliga tilafturskomnum bygdum, sum hava tað til endamáls at fremja vinnulívið har. Hin skattafrí peningur er í uppskotinum settur til í mesta lagi 10.000 kr. árliga.

Skuldi tað nú hent, at slíkur parta- ella lutaeigari innan fyri 7 ár selir part ella lut sín, eigur hann ikki at fáa skattligan fyrimun av slíkari sølu, men skal tá hin áður skattfrælsa íløga koma undir skattskyldu.

Tað ber ikki til í lóg at skilgreina, hvørjar bygdir ið skulu teljast vera tilafturskomnar, og verður slíkt altíð ein metingarspurningur. Mælt verður tí til, at landsstýrið eftir tilmæli ídnaðarstovunnar og menningargrunsins ger skrá yvir tær bygdir, ið koma undir hesi lógarfyrimæli.

Harnæst metir Tjóðveldisflokkurin tað vera rætt, at landsstýrið í hesi lóg saman við fíggjarnevndini fær standandi heimild til úr landskassanum at seta upp í 20% av parta- ella lutapeninginum í slík bygdavinnulívsfeløg. Í slíkum førum skal landsstýrið í minsta lagi hava ein nevndarlim í viðkomandi felagi.

Nærri reglur um útinning lógarinnar setir landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 14. februar 1983 og undir 1. viðgerð 17. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Vegna skattalógargávuliga táttin er uppskotið frá fíggjarnevndini sent Líkningarráði Føroya til ummælis, og hevur Líkningarráð Føroya í skrivi frá 6. mai viðgjørt spurningin. Avrit av hesum skrivi er viðlagt álitinum sum skjal.

Fíggjarnevndin hevur tikið endaliga støðu til álitið 6. mai og hevur býtt seg í fimm minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen) tekur ikki undir við málinum. Ásannað verður, at positivar hugsanir eru í uppskotinum, men vísir nevndi minniluti til meginvansarnar viðvíkjandi skráseting, at skattareglur eru í eini slíkari lóg sum uppskotið, og at umsitingin av lógini verður trupul.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) ásannar, at tey sjónarmið, sum liggja til grund fyri uppskotið, eru ov týðandi og neyðug, um nøkur menning skal gerast í teimum meiri fjarskotnu pørtunum í landinum. Tað er tí umráðandi at fáa lýst, hvørjir partar av landinum, talan kann verða um. Minnilutin kann tó ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti um skattligar fyrimunir, men er av teirri áskoðan, at umhugsað verður at geva hesum økjum fyrimunir í stuðuli og lánum frá almennum grunnum (menningar- og ídnaðargrunninum). Eisini er tað umhugsanarvert at taka til eftirtektar somu lagaligu figging til ídnað á hesum plássum sum hana, ið veitt verður landbúnaðinum. Tikið verður undir við tí setningi, at landsstýrið í sínum arbeiði viðvíkjandi bygdamenningar-

spurningunum ger neyðuga kanning til skráseting av bygdum, ið kundu verið umfataðar av møguligum lógaruppskoti hesum viðvíkjandi.

Minnilutin (Atli P. Dam) førir fram: Ásannast má, at bygdamenningin ikki er komin í fasta legu, og at stórur tørvur er á at fremja tiltøk, sum seta ferð í útbygging, eisini í heilt smáum økjum. Kortini metir minnilutin, at meginvansin við at samtykkja fyriliggjandi uppskot er skrásetingin av, hvør skal koma undir lógina. Heldur ikki heldur minnilutin, at bygdamenning eigur at grundast á skattaavskrivingar, hesum er ov mikið av frammanundan. Tí eiga reglur at verða gjørdar, har almennur stuðul beinleiðis verður stýrdur út á økini, har tørvur er á vinnuskapandi íløgum. Samstundis mugu beinanvegin takast stig til at avmarka galdandi avskrivingarreglur.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) metir, at ætlanin við uppskotinum er góð, men at tað ikki verður lagt fyri

I. At skilja út, hvørji pláss eru undir menning,

II. At umsita skattligt

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at koma við broytingaruppskoti til samtíðarskattalógina, soleiðis at nýgoldin partapeningur verður loyvdur frádrigin skattliga við ávísum lutfalli.

2. viðgerð 16. mai. §1 fall við 7-0 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Tórálvur M. Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen,

Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.
Burturstaddir: Jóannes Dalsgaard.

---

Líkningarráð Føroya
3800 Tórshavn, 6. mai 1983

Løgtingsins fíggjarnevnd
att.: Ivan Johannesen, formaður

Eftir áheitan skal ráðið gera nakrar viðmerkingar til tann skattliga partin av uppskotinum frá Tjóðveldisflokkinum til løgtingslóg um bygdamenning (løgtingsmál nr. 72/1982).

Í 1. gr., 1. stk. verður í uppskotinum heimilað teimum, sum seta pening í tey her umrøddu feløg, ein skattligan frádrátt við upp til ávísa upphædd árliga.

Í somu gr., 2. stk. verður víðari skotið upp, at um parturin verður seldur innan fyri 7 ár, skal tann áður frádrigna upphæddin inntøkuførast aftur.

Í fyrstu atløgu vil líkningarráðið gera vart við, at eftir tess fatan eiga allar reglur um, hvussu inntøkuuppgerðin skal gerast til skattavaldið, herundir hvørjir frádráttarmøguleikar eru, at *finnast í skattalógini*, og tað vil tí vera sera óheppið fyri heildaryvirlitið, um skattareglur vera at finna eisini í ymsum øðrum lógum.

Í aðru syftu skal vísast á, at *ávíst umsitingarligt arbeiði* vil standast av tílíkari lóggávu, tí neyðugt vildi verið at havt eftirlit við, at frádrátturin varð í samsvar við reglurnar og at ført eitt yvirlit yvir gjørdar frádráttir seinastu sjey árini.

Tórshavn, 6. mai 1983
Líkningarráð Føroya
Eyðun á Rógvi Olsen

# 73. Fútin og galdandi pornografilóg í Føroyum

Ár 1983, mikudagin 16. februar legði Tordur Niclasen, løgtingsmaður, vegna Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at heita á fútan um at røkja sína skyldu í sambandi við galdandi pornografilóg í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Tað eru nú fleiri ár síðan, at einstaklingar eins væl og bólkar av fyrstani gjørdu vart við seg hjá avvarðandi myndugleikum og vístu á, at siðloysis (pornografiskur) lesnaður (bløð við myndum o.a.) vórn seld í kioskum og bókhandlum kring landið.

Samstundis varð heitt í somu myndugleikar (politivaldið) at taka sær av málinum og steðga søluni og harvið gera sítt til, at galdandi lóg varð hildin.

Hóast avvarðandi myndugleiki síðan tá javnan er gjørdur varugur við umtalaðu sølu, so er ikki stórvegis hent í hesum máli, tí nú, sum kanska ongantíð áður, hevur ein slík flóð av danskari ómentan floymt inn yvir land okkara. Besta prógv um hetta er tað vaksandi úrvalið av siðloysis (pornografiskum) lesnaði, ið liggur frammi til sølu í mongum blaðbúðum og bókhandlum kring landið..

Umframt at galdandi lóg ikki verður hildin:

*§234 (594) Med bøde, hæfte eller under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 6 måneder straffes den, som*
*1) tilbyder eller overlader en person under 18 år utugtige skrifter, billeder eller genstande,*
*2) offentliggør eller udbreder eller i sådan hensigt forfærdiger eller indfører utugtige skrifter, billeder eller genstande,*
*3) foranstalter offentligt foredrag, forestilling eller udstilling af utugtigt indhold.*

*Stk. 2. Begås de ovenfor nævnte handlinger i erhvervsmæssigt øjemed, kan kun under særlig formildende omstændigheder straf af bøde anvendes.*

*Stk. 3. Den, der for vindings skyld offentliggør eller udbreder eller i sådan hensigt forfærdiger eller indfører skrifter eller billeder, der, uden at de kan anses for egentlig utugtige, udelukkende må antages at have forretningsmæssig spekulation i sanselighed til formål, straffes med bøde eller hæfte.*

...so er at harmast um og má átalast, at avvarðandi myndugleiki hevur sett »kikaran fyri tað blinda eygað« viðvíkjandi galdandi lóg í *Føroyum*.

Eisini má havast í huga, at júst umtalaði lesnaður er m.a. við til:

1. Geva uppvaksandi ættarliði eina »forkvaklaða« mynd av samlívinum millum mann og kvinnu
2. Lítilsvirða kvinnuna, har henda verður sett fram sum ein sølu- og brúksvøra.

At tingmenn áður hava nomið við spurningin viðvíkjandi pornografiskum lesnaði, skilst av viðgerðini á sambandi við løgtingsmál nr. 8 og 9/1978 (vetrarting), har ein 6-mannanevnd (Signar Hansen, Hilmar Kass, Jona Henriksen, Adolf Hansen, Agnar Nielsen og Jógvan Sundstein) m.a. eisini átti at kanna spurningin viðvíkjandi pornografiskum lesnaði í Føroyum.

At ein »danisering« fer fram á hesum øki er ikki ynskiligt, tí sum kunnugt: her hóskar **danskur** mátistokkur **ikki** í sambandi við **føroyska** siðalæru.

Í hesum sambandi kann ikki annað enn havast í huga, at álvara má gerast av at fáa sett á stovn okkara egna politivald í Føroyum.

1. viðgerð 18. februar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 12. apríl legði fram soljóðandi

## Álit
## I

Málið varð framlagt av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum tann 16. februar 1983 og við 1. viðgerð beint í lóganevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin tosað við Bjørn Klyver, fútafulltrúa. Hann upplýsti m.a., at fútin hevur givið løgregluni generellar reglur at ganga eftir, hvørji bløð kunnu seljast / ella ikki seljast í kioskum og hevur í 1978 innskerpað øllum kioskum at halda galdandi reglur. Bøkur og bløð á bókasøvnum kannar løgreglan ikki og heldur ikki tær bøkur, sum vanligu bókahandlarnir selja. Viðvíkjandi video-bondum til útleiging hevur løgreglan gjørt eina kanning, og vísti hon, at bondini ikki kundu sigast at vera pornografisk.

Eftir teimum upplýsingum, sum nevndin hevur fingið, heldur nevndin seg ikki kunna siga, at fútin misrøkir sína skyldu á hesum øki og er uppskotsstillarin ónøgdur við fyrisiting fútans á hesum øki, stendur honum frítt fyri at kæra á røttum staði (ríkispolitistjórin).

Vísandi til frammanfyri standandi setir nevndin einki uppskot fram.

2. viðgerð 26. apríl. Málið varð aftur beint í lóganevndina, sum 17. mai legði fram nýtt soljóðandi

## Álit
## II

Nevndin framlegði álit í málinum tann 12. apríl 1983.

Undir 2. viðgerð varð málið beint aftur í Lógarnevndina, so uppskotsstillarin kundi greiða frá hvørji bløð hann sipaði til í uppskoti sínum.

Uppskotsstillarin hevur á fundi í nevndini greitt frá, hvørji bløð hann hugsar um, og framlegði nøkur bløð, sum hann beint frammanundan hevði keypt í kioskum og vanligum bókahandlum.

Nevndin hevur lagt hesi bløð fyri landfútan og biðið hann kanna, um bløðini kunnu metast at vera pornografisk.

Fútin hevur kannað bløðini og sigur, at linjan, løgreglan hevur lagt, ikki kann sigast at verða fylgd. Løgreglan vil nú taka støðu til, hvat gerast skal við málið.

Vísandi til frammanfyri standandi mælir nevndin tinginum til at viðtaka fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið verður biðið um at heita á fútan um at ansa eftir, at §234 í revsilógini verður hildin.

Framhaldandi 2. viðgerð 17. mai. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 501-3-13

# 74. Løgtingslóg um svartkjaftavirki

Ár 1983, mikudagin 16. februar legði Petur Reinert, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um svartkjaftavirki**

**§1.** Landsstýrinum verður heimilað at seta upp til 20% av eginpeninginum í tvey svartkjaftavirki, annað í Gøtu og hitt í Kollafirði.

**§2.** Landsstýrinum verður heimilað at veita landskassaveðhald fyri upp til 30% av íløgupeninginum.

**§3.** Landsstýrinum verður heimilað at veita upp til 3 milliónir krónur í studningi, sum skal nýtast til kanningar fyri at finna fram til bestu og mest skynsomu gongd av arbeiðinum og nýtslu av tólum á hesum komandi virkjum.

**§4.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**Viðmerkingar:**
Talan er um at byggja tvey virki, eitt í Gøtu og annað í Kollafirði, sum burturav skulu nýtast til at fáa matvørur burturúr svartkjafti. Bæði hesi virki eru projekterað, og tekningar eru til skjals. Í báðum førum er byggibúgvið øki til taks á havnarlagnum, og principiel tilsøgn fyriliggur frá báðum kommunum og frá landsverkfrøðingsstovninum.

Hesi hæði virki eru mett at kosta stívar 100 milliónir krónur at byggja.

Rakstrarliga eru bæði virki projekterað at hvíla í sær sjálvum uttan stuðul frá tí almenna. Og í báðum førum hava menn roknað við at gjalda 2 krónur fyri kilo av svartkjafti í rávøru. Eginpeningur er til taks hjá báðum virkjum.

Projektini hava ligið hjá landsstýrinum ávikavist 5 fjerðingsár og hálvt ár, uttan at málið er komið víðari.

Royndirnar at fiska svartkjaft til matna og føra hann til lands hesi bæði seinastu árini hava sýnt, at bæði virkini kunnu fáa ivaleyst av góðari rávøru til ætlaðu nýtsluna uppá 75.000 tons um árið við verandi flota.

Sølan av teimum umleið 30.000 tonsunum, sum kunnu fáast burturúr hesi rávøru sum søluprodukt til søluvirði uppá umleið 1/4 milliard krónur — ella 25% av samlaða eksportvirðinum í 1982 — skuldi eftir besta manna meti til ta tíð ikki volt nakrar trupulleikar.

Tað má vera heilt greitt, at skal svartkjafturin gerast tað búskaparliga íkastið, sum so stórur tørvur er á, so má henda vinna í øllum liðum hvíla í sjálvum sær og ikki á almennan stuðul.

Samstundis mugu vit gera okkum klárt, at bert við servirkjum kann viðgerðin á landi gerast so rationell, at óneyðugar arbeiðslønir ikki dýrka framleiðsluna so, at ov lítið er til øll hini liðini. Flestir kønir menn eru tí samsintir í tí, at rætta leiðin er at leggja høvuðsdentin á servirki til svartkjaft heldur enn blandingsvirki, har svartkjaftur verður viðgjørdur saman við botnfiski undir somu lon.

Tað verður harumframt alt ov dýrt fyri skipini, sum fiska, at flyta havn av havn at landa svartkjaftin, og góðskan versnar munandi av hesum og verður hartil ójøvn. Bert hetta síðsta skuldi verið nóg mikið prógv fyri, at rætta loysnin er stór servirki.

Bæði tey nevndu virkini koma í øki, har lítið og einki arbeiði er á landi frammanundan, fólkið sum har býr, hevur langan veg til arbeiðis, so hetta er eisini í sjálvum sær bygdamenning.

Virkið í Kollafirði kann fáa arbeiðsfólk úr 5-6 bygdum í Norð-

streymi, og virkið í Gøtu kann umframt at fáa arbeiðsfólk úr Gøtunum eisini fáa fólk úr Leirvík, tá bergholið er liðugt.

Loyvi at frávikja tíðarfreistini at viðgera málið varð givið. 1. viðgerð 16. februar. Málið varð viðgjørt saman við nr. 65: Lán til frysti- og flakavirkir. Málini vórðu bæði beind í fíggjarnevndina, sum 18. mars legði fram soljóðandi

## Álit
## I

Málið varð lagt fram av Peturi Reinert tann 16. februar 1983 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og var fundur tann 4. mars 1983 við umboð fyri fylgjandi:

Heilsufrøðiligu Starvsstovuna,
Menningargrunnin,
Ídnaðarstovuna,
Ídnaðargrunnin,
Felagið Nomatek,
P/F Dyllan og
ætlað svartkjaftavirki í Gøtu.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) er eftir nevnda fund komin til ta niðurstøðu, at málið ikki er búgvið til støðutakan. Nevndi meiriluti metir, at hetta mál er í tráð við tað, sum landsstýrið í løtuni arbeiðir við innanfyri svartkjaftaspurningin.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

## Uppskot
## til
## samtyktar

Málið verður at senda landsstýrinum við áheitan um, at landsstýrið gevur spurninginum um útbygging av svartkjaftavirkjum sum heild skjóta og positiva viðgerð.

Ein minniluti (Ove Mikkelsen) mótmælir viðgerðini av málinum, serliga at bræv frá 7. mars 1983 frá ætlaðum fiskavirki í Gøtu ikki er viðgjørt.

Metir tað vera skeivt, at svartkjaftavirkir burturav ikki verða bygd, tá veiða eftir svartkjafti vanliga fellur saman við bestu veiðitíð eftir

vanligum botnfiski. Ynskiligt var, at eitt slíkt virki verður bygt aftur-at, serliga tá hugsað verður um kappingarførið her á landi. Vísir til týdningin av, at partroling verður stimulerað.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at virkis- og váðafúsur peningur, sum fær loyvi at virka í samfelagnum, samanumtikið er arbeiðsskapandi. Av tí at tílíkur peningur er avmarkaður til ávísar upphæddir, førir ein og hvør tálman av fløgunum við sær eina minking av arbeiðsskapandi virksemi.

Tað er tí av størsta týdningi, at einstaklingar og feløg skjótast til ber fáa boð um, antin teirra fløguætlan fær loyvi at verða sett í verk ella ikki.

Í førinum Dyllan í Kollafirði og nýggja svartkjaftavirkið í Gøtu er støðan tann, at tann virkis- og váðafúsi peningurin, sum stendur aftanfyri, longu hevur ligið lamin og bíðað í tvey ár. Tann politikkur, landsstýrið á svartkjafta-økinum hevur lagt fyri dagin, ber boð um, at nevndi peningur enn eina tíð, ja, kanska eini 4 til 6 ár, kemur at liggja lamin.

Tað vil tí vera rætt at geva hesum einstaklingum og feløgum greið boð um, nær teir í fyrsta lagi kunnu rokna við at fáa loyvi at gera ætlaðu íløgurnar. Hetta tí at um tíðin, ið bíðast skal, er ov long, eru møguleikar fyri, at teir nýta peningin til onnur endamál. Tann virkis- og váðafúsi peningurin kann solcíðis gerast arbeiðsskapandi, meðan bíðað verður eftir endaligu støðutakan landsstýrisins í svartkjafta-politikki sínum.

Undir ongum umstøðum tænir tað nøkrum góðum endamáli at lata peningin liggja deyðan og bíða í óvissuni. Serstakliga tá hugsað verður um arbeiðsstøðuna, sum hon er í hesum døgum.

Minnilutin setur tí fram soljóðandi

## Uppskot
## til
## samtyktar

Málið verður at senda landsstýrinum við áheitan um at geva tí eina positiva og greiða viðgerð skjótast til ber.

Heitt verður á landsstýrið um ikki í alt ov langa tíð at lata virkis- og váðafúsan pening bíða eftir almennu støðutakanini í framtíðar svartkjaftapolitikki og harvið tarna møguligum øðrum arbeiðsskapandi virksemi.

Minnilutin (Atli P. Dam) mótmælir, at málið verður sent landsstýrinum á tí viðgerðarstigi, tað nú er. Landsstýrið hevur havt hesi mál til viðgerðar í meira enn 1 1/2 ár, og tykist støðan í landsstýrinum vera hon, at tey skulu goymast í onkrari skuffu, onkrari nevnd ella onkrum ráði.

Fíggjarnevndin hevur júst útvegað eitt sera rúgvusmikið, forvitnisligt og vísindaligt grundað tilfar viðvíkjandi svartkjaftaveiðu, viðgerð og sølu.

Hetta tilfar, ið er útvegað frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Fiskirannsóknarstovuni, Ídnaðarstovuni og projekteringsfeløgunum, bendir alt á, at vit eru nakað fremri viðvíkjandi møguleikunum fyri lønandi svartkjaftavinnu, enn studningsskipanirnar benda á.

Somu mynd bendi fundur við fíggingarstovnarnar, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Ídnaðarstovuna og umsøkjararnar á.

Tað er tí helst so, at ein nærri kanning av hesum rúgvusmikla tilfari greitt hevði sýnt, at tíðin nú er komin til at byggja eitt ella tvey servirki og at skunda undir fløguna á skipasíðuni.

Omanfyri nevnda tilfar fevnir um fleiri hundrað síður, og hevur fíggjarnevndin als ikki givið sær stundir til at viðgera hetta til botns.

Minnilutin metir hesa støðu óforsvarliga. Lagna málsins er eisini vís, verður tað sent landsstýrinum, tí hetta hevur jú almannakunngjørt, at útbygging, sum er her tilætlað, verður skotin út í framtíðina.

Minnilutin heldur, at løgtingið eigur at áleggja fíggjarnevndini at realitetsviðgera hesi projekt og koma við lidnum tilmæli aftur til tingið.

2. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina aftur, sum 18. mars legði fram soljóðandi

**Álit**
**II**

Málið varð lagt fram av Peturi Reinert tann 16. februar 1983 og undir 1. viðgerð sama dag varð tað beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og undir 2. viðgerð 24. mars 1983 var málið afturbeint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur aftur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Adolf V. Hansen, Ove Mikkelsen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) heldur fast við sína støðu í álitinum dagf. 18. mars 1983.

Ein minniluti (Atli P. Dam) førir fram, at hann eina ferð enn hevur skotið upp, at fíggjarnevndin fer undir eina veruliga viðgerð av spurninginum um útbygging av svartkjaftaviðgerð á landi við tí fyri eyga at taka støðu til, um tað er skilagott at útbyggja servirkir ella at útbyggja verandi flakavirkir.

Skotið er upp, at fíggjarnevndin, nú tingsetan er farin, uttan at nøkur viðgerð hevur verið av tí rúgvusmikla tilfari, sum nú fyriliggur, arbeiðir víðari við spurninginum til ólavsøku.

Hetta fekk ikki undirtøku, men setir minnilutin tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur fíggjarnevndini áðrenn ólavsøkutingsetuna at realitetsviðgera spurningin um svartkjaftaútbygging á landi til tess at røkka prinsipiella støðutøku viðvíkjandi vali millum útbygging av servirkjum og útbygging av verandi flakavirkjum.

Framhaldandi 2. viðgerð 31. mai. Atkvøðugreiðsla 1. juni. § 1 fall við 15-0. Uppskot til samtyktar frá meirilutanum í fíggjarnevndini fall við 15-0, uppskot til samtyktar frá minnilutanum (Atli P. Dam) fall við 15-0 og frá minnilutanum (Adolf Hansen) fall við 3-0.

F.L.j.nr. 1515-4-8

# 75. Eftirlit við videofilmum til útleigingar

Ár 1983, hósdagin 17. februar legði Tordur Niclasen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fyriskipa, at video-filmar, sum verða útleigaðir, koma undir somu eftirlitsskipan, ið galdandi er fyri Filmseftirlitið.

**Viðmerkingar:**
Sum kunnugt er virkisøki hjá filmseftirlitinum skipað eftir lóg nr. 117 frá 13/4-1938 (lov om biografvæsenets ordning), kunngerð nr. 134 frá 31/3-1960 (bekendtgørelse om censurering af film) og kunngerðini frá landsstýrinum (1982) um 12 ára aldursmarkið.

Eftir galdandi skipan umfatar heimildin hjá Filmseftirlitinum bert filmir, ið vístir verða alment.

Støðan er sostatt tann, at meðan peningur verður avsettur á fíggjarlógini, til tess at eftirlitið av innfluttum filmum til almennar framførslu kann fara fram, verður eitt ótal av video-filmum innfluttir og útleigaðir, *uttan* at samsvarandi — ella nakað sum helst — eftirlit verður framt.

Hetta má metast at vera skeiv mannagongd, tá m.a. hugsað verður um, at lógarheimild er fyri, at ávísir filmar ikki verða vístir — ella falla fyri ásettum marki (12 ár og 16 ár) — í bio-høllum, meðan somu filmar uttan nakað fyrivarni kunnu fáast til leigu í øðrum hami: **Video.**

Eyðsæð er, at skipanin kemur at økja um arbeiðsbyrðina hjá filmseftirlitinum og harvið øktar útreiðslur á fíggjarlógini.

Hesar eyka útreiðslur kundu heilt ella partvíst verið fíggjaðar við øktum innflutningsgjaldi á videofilmarnar.

1. viðgerð 18. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 2. mars 1983 beint í sosialu nevndina.

Uppskotsstillarin skjýtur upp, at videofilmar til útleigingar koma undir somu eftirlitsskipan sum biograffilmar.

Undir orðaskiftinum við 1. viðgerð upplýsti Páll Vang, landsstýrismaður, at landsstýrið hevur sett nevnd at endurskoða biograflógina og herundir eisini taka spurningin um videofilmar við.

Spurningurin er stórur og verður viðgjørdur um allan heimin, ikki minst í Norðanlondum. Størstu trupulleikarnar hjá okkum taka seg helst upp í sambandi við, hvussu lætt tað er at fáa videofilmar sendandi við posti, serliga úr Danmark.

Viðvíkjandi teim videofilmum, sum verða útleigaðir ella seldir frá handli í Føroyum, kann óivað gerast ein skipan, sum samsvarar við hana, ið Filmseftirlitið nú arbeiðir eftir.

Fyritreytirnar eru, at útleiging og søla av videofilmum bert verður framd av teim, ið hava fingið serligt loyvi til tess. Harnæst at allir filmar liggja sjónliga frammi, og at álítandi frágreiðing um innihaldið í filmunum fylgir við, soleiðis at eftirlitið kann gerast við stakroyndum.

Sosiala nevndin er stórt sæð samd við uppskotsstillaran um tey sjónarmið, sum førd verða fram í uppskotinum og í viðmerkingunum, men av tí, at nevnd er sett at kanna málið, setir ein samd nevnd tí í staðin fyri upprunaliga uppskotið fram hetta

## Uppskot til samtyktar

Í sambandi við, at nevnd er sett at endurskoða biograflógina, heitir Løgtingið á Landsstýrið um at fyriskipa, at video-filmar til sølu og útleiging koma undir somu eftirlitsskipan, sum galdandi er fyri filmar til almenna framvísan.

2. viðgerð 17. mai. Uppskot til samtyktar frá sosialu nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

# 76. Interkommunala ruskbrennistøðin í Saltnesi í Nes kommunu

Ár 1983, týsdagin 8. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur til eftirtektar, at landsstýrið ger av, um Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin skal fáa loyvi at byggja brennistøð á Saltnesi í Nes kommunu.

**Viðmerkingar:**
Málið um, at Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) byggir eina ruskstøð við brenniovni á Saltnesi í Nes kommunu, hevur frá byrjanini verið nógv umrøtt millum politikkarar, í bløðum og millum manna. Mest umrøddi spurningurin hevur verið dálkingarvandin og síðani spurningurin, um støðin kom at lýta náttúruna.

Seinasta orðið higartil í málinum er avgerð yvirheilsunevndarinnar um at seta úr gildi góðkenningina hjá kommunalu heilsunevndini av byggiloyvinum, men er avgerðin beind til landsstýrið.

Eisini í landsstýrinum eru áskoðanirnar ymiskar, um loyvi skal gevast til bygging, hóast avgerð yvirheilsunevndarinnar ella avgerðin skal standa við makt.

Ein meiriluti er tó í landsstýrinum at leggja málið fyri løgtingið, áðrenn landsstýrið tekur støðu til kæruna frá IRF.

Í metingini av dálkingarvandandum er tað av týdningi at vita, at einasta frárenning frá brennistøðini verður vanligt skarns- og toilet-vatn. Kølivatnið verður í eini afturlatnari skipan soleiðis, at tað verður leitt frá brennistøðini til ein hitavekslara niðri á Toftum og síðani til brennistøðina. Verður hitavekslarin ikki settur upp, verður vatnið kølt í rørleiðingini út á sjógv og niðan á støðina.

Eisini er felagsskapurin, um tað aftaná eina royndartíð, t.d. upp á 2 ár, vísir seg, at dálkingin frá skorsteinunum er størri enn ætlað, fyri at gera cykareinsiverk av roykinum. Kostnaðurin av hesum er mettur til 6 mió. kr. til bygging og 1 mió. kr. árliga í rakstri.

Gongdin í málinum er í stuttum henda:

1. Tann 5. august 1980 søkti IRF Nes kommunu um byggiloyvi til ruskbrennistøð antin í Mýrunum ella omanfyri, uttanvert við Saltnes (skjal 1).
2. Tann 18. august 1980 gevur Nes bygdaráð IRF principiella tilsøgn um byggiloyvi, men uttan at taka støðu til nakað ávist øki (skjal 2).
3. Við skrivi frá 28. august 1980 sigur friðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu frá, at hon kann góðkenna, at ruskbrennistøðin verður bygd á Rustini undir Høganesi. Henda avgerð verður góðkend av Yvirfriðingarnevndini.
4. Síðani søkir IRF um landskassaveðhald fyri neyðugum láni til fíggjan av brennistøðini, og leggur landsstýrið við skrivi frá 17. december 1980 málið um veðhald fyri løgtingið, sum beinir málið í fíggjarnevndina. Aftan á at landsstýrið (nývalda) í februar 1981 hevði havt høvi at gera viðmerkingar til uppskotið, legði fíggjar-nevndin málið aftur fyri tingið saman við áliti. Løgtingið samtykti síðani at geva landsstýrinum heimild landskassans vegna at veðhalda fyri láninum, løgtingsmál nr. 10/1980 (vetrarting).
5. Nes bygdarráð gevur við skrivi frá 30. december 1981 IRF endaligt byggiloyvi á Rustini undir Høganesi, men undir ávísum treytum (hesar framganga av skjali nr. 4).
6. Nes heilsunevnd góðkendi tann 23. apríl 1982, at IRF byggir brennistøðina sambært nevnda byggiloyvi frá 30. december 1980 og undir teimum í byggiloyvinum ásettu treytum. Hendan avgerðin verður tann 27. mai 1982 kærd til Yvirheilsunevndina, sum aftan á at hava fingið ummæli frá danska umhvørvismálaráðnum (Miljø-styrelsen) tann 21. oktober 1982 avgjørdi at seta úr gildi avgerðina hjá Nes heilsunevnd jbr. skjal 4.
7. Henda avgerð Yvirheilsunevndarinnar er løgd fyri landsstýrið

av IRF, og vísir IRF til heimild landsstýrisins eftir § 47 í galdandi heilsusamtykt fyri Nes kommunu at broyta avgerð Yvirheilsunevndarinnar (skjal 5). Eisini vísir IRF til landsstýrisins generalheimild eftir lógini um heilsusamtyktir, jbr. skjal 6.
8. Vegurin til ruskbrennistøðina er komin væl áleiðis, og útspreingingin av byggilendinum er gjørd. Hetta saman við byggibúning, liðugtgerð av vegi (hetta verður neyðugt, líkamikið um støðin verður bygd ella ei), projektering v.m. verður mett til uml. 7,5 mió.kr. (sambært IRF tann 13. december 1982).

Sí skjølini 13 A-1

Undir 1. viðgerð 14. mars legði Erlendur Patursson vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Sambært §21 í tingskipanini samtykkir tingið at vísa tingmáli nr. 76/1982: Interkommunala ruskbrennistøðin á Saltnesi í Nes kommunu burtur.

Hetta uppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

1. viðgerð 11. mars, framhald 14. mars. Uppskot frá Tjóðveldisflokkinum um at beina málið burtur fall við 14-0 atkvøðum. Málið varð síðani beint í umhvørvisnevndina, sum 25. mars legði fram soljóðandi

**Álit**
**I**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 7. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 14. mars beint í umhvørvisnevndina.

Umhvørvisnevndin hevur viðgjørt uppskotið á fundi tann 18. mars og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sv. Aage Ellefsen, Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen og Vilhelm Johannesen) heldur, at avgerð eigur sum skjótast at verða tikin viðvíkjandi ruskbrennistøðini á Saltnesi.

Meirilutin setir sostatt fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum sum skjótast at taka avgerð, um Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin skal fáa loyvi at byggja brennistøð í Saltnesi í Nes kommunu.

Minnilutin í nevndini (Petur Reinert) førir fram:

Málið varð lagt fyri tingið av landsstýrinum, sum biður tingið um heimild at taka støðu í málinum.

Áðren málið kom til 1. viðgerð, vístu tingformaðurin og aðrir á, at hetta var løgin framferð, tí eftir stýrisskipanini var hetta reint avgreiðslumál, sum landsstýrið hevði fulla heimild at avgreiða.

Samsvarandi hesum setti tjóðveldisflokkurin uppskot um at vísa málið burtur, men hetta uppskot varð felt.

Undir teirri fylgjandi 1. viðgerðini, sum gjørdist rættiliga drúgv, kravdu fleiri tingmenn úr ymsum flokkum, at málið fekk gjølla viðgerð í tinginum, og varð m.a. kravt, at umhvørvisnevndin, sum málið varð beint í, gjørdi eitt ávíst kanningararbeiði.

Í umhvørvisnevndini kom málið sjálvt als ikki til viðgerðar, men allir nevndarlimir uttan undirritaði samdust uttan nevndarviðgerð um at mæla tinginum til at samtykkja at senda landsstýrinum málið aftur til avgreiðslu.

Minnilutin má harðliga mótmæla, at málið ikki hevur fingið líkinda viðgerð í umhvørvisnevndini, tí tað má haldast, at tilfarið, sum landsstýrið hevur sent tinginum í málinum, er alt ov ófullfíggjað og einstáttað (m.a. var tað tilfar, sum meirilutin í yvirheilsunevndini kann hava bygt avgerð sína á, ikki við, t.d. bræv frá miljøstyrelsen í Danmark og bræv frá Støðisútbúgvingini). Harumframt koma skuldsetingar um óregluliga, ja beinleiðis ólógliga framferð í hesum máli fram undir fyrstu viðgerð, og metir minnilutin hesar skuldsetingar so álvarsligar, at nevndin átti at kanna tær nærri.

Hetta er fyrsta álvarsmál, sum hevur stungið seg upp um umhvørvið sum heild í Føroyum, men onnur eru tí á baki, tí má tingið enn eina ferð streingja á landsstýrið um at seta ta nevnd, sum skal fyrireika umhvørvislóg, beinan vegin.

Hetta varð álagt landsstýrinum í fjør, men enn hevur landsstýrið

ikki lætt hond frá síðu í hesum máli.

Í hjálparloysi sínum skumpaði landsstýrið avgerðina í hesum álvarsmáli frá sær til tingið. Meirilutin í umhvørvisnevndini sýnir sama hjálpar- og atgerðarloysi við at senda málið óviðgjørt aftur til landsstýrið.

Henda ábyrgdarloysisleik vil tjóðveldisflokkurin ongan lut eiga í, men mælir til, at tingið nú tekur avgerð í málinum.

Minnilutin setir tí fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at fylgja niðurstøðu meirilutans í yvirheilsunevndini í málinum um bygging av brennistøð á Høganesi í Nes kommunu.

2. viðgerð 7. apríl. Skotið varð upp ikki at beina málið aftur í nevnd, hetta fall við 9-0. Uppskot um at beina málið aftur í umhvørvisnevndina fall við 15-0. Uppskot um at beina málið í 6-mannanevnd varð samtykt við 22-0.

Í hesa nevnd vórðu valdir: Svend Åge Ellefsen, Ivan Johannesen, Vilhelm Johannesen, Frederik Olsen, Adolf Hansen og Erlendur Patursson.

16. mai legði 6-mannanevndin fram soljóðandi

**Álit**
**II**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 7. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í Umhvørvisnevndina. Eftir uppskotinum bað landsstýrið løgtingið um at taka til eftirtektar, at landsstýrið ger av, um Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin skuldi fáa loyvi at byggja brennistøð á Saltnesi í Nes kommunu.

Tann 25. mars 1983 legði umhvørvisnevndin fram álit í málinum, har ein meiriluti setti fram uppskot til samtyktar um at áleggja landsstýrinum sum skjótast at taka avgerð, um Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin skuldi fáa loyvi at byggja brennistøð á Saltnesi í Nes konimunu. Ein minniluti mælti til, at løgtingið samtykti at fylgja avgerðini hjá Yvirheilsunevndini.

Undir 2. viðgerð tann 7. apríl 1983 varð málið beint í eina serliga 6-manna tingnevnd við einum umboði úr hvørjum flokki.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fundir um málið við bygdaráðið í Nes kommunu, býráðið í Runavíkar kommunu, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, kommunufelagið, I.R.F.-felagsskapin, Yvirheilsunevndina, tey, ið kærdu avgerðina hjá Nes Sóknar Heilsunevnd inn fyri Yvirheilsunevndina, og renovatiónsnevndina hjá Tórshavnar býráð og verið á staðnum á Saltnesi, har ætlanin er at byggja støðina, og á Fossdalsbakka. Eisini hevur nevndin hugt at 2 ruskplássum í Vágum og ruskplássinum á Krossi við Svínáir.

Ein helmingur av nevndini (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen og Vilhelm Johannesen) førir fram:

Hesin parturin av nevndini leggur dent á, at tann støðan, sum vit í løtuni hava við verandi køstum kring landið, er ótolandi og ikki kann verða nøkur varandi loysn í hesum máli.

Undir viðgerðini í nevndini hevur talan verið um ymiskar loysnir av renovatiónsspurninginum. Serstakliga hevur verið tosað um tyrving av burturkasti á sokallaðum vardum dungum og um brenning av burturkasti í tíðarhóskandi brennistøð.

Frá fólki, sum hava kannað renovationsviðurskiftini í Danmark, hevur nevndin fingið upplýst, at lendir, ið verða nýtt til tyrving av burturkasti, ikki longur eru nýtilig til matjørð. Tað er heldur ikki kunnugt, hvat hendir við tungmetallum, kviksilvuri og øðrum vandamiklum burturkasti, sum verður lagt í slíkar dungar.

Tað er eisini upplýst fyri nevndini, at skal alt burturkastið í Føroyum tyrvast, so krevur hetta eitt slætt lendi uppá 20.000 kvm um árið, ið ikki verður nýtiligt sum matjørð longur. Hesin parturin av nevndini heldur ikki, at vit hava ráð til at nýta so stórt lendi til hetta endamál. Eisini kann vandi standast av, at flótandi burturkast frá hesum dungum rennur út í firðir og sund til skaða fyri ta fiskaaling, sum vit eru við at byggja upp. Tyrving hevur verið roynd á ymiskum renovatiónsplássum í Føroyum. Ofta hevur staðið á at fáa nóg mikið av tilfari til hesa tyrving.

Fólk, sum hava kannað renovatiónsviðurskiftini í Danmark, hava eisini vitjað ruskpláss, sum nýta kompostering. Her verður ein partur av burturkastinum gjørdur til mold. Ein annar partur verður brendur, og ein triði partur verður fyribeindur á annan hátt. Í Danmark sýna royndirnar, at tað er torført at sleppa av við mold, sum er gjørd burtur úr húsarhaldsburturkasti. Í Danmark er tendensurin annars tann, at gingið verður burtur frá tyrving

og kompostering, yvir til nýmótans brennistøðir.

Av tí tilfari, sum fyriliggur í málinum, umframt tað tilfar, sum nevndin sjálv hevur útvegað sær, og teimum frágreiðingum, ið nevndin hevur fingið aftaná fundir við feløg v.m., verður vandin við bygging av brennistøð á Høganesi mettur at verða ein møgulig dálking av Toftavatni, sum verður nýtt til drekkivatn í Runavík. Allir sakkønir eru samdir um, at ein møgulig dálking av vatninum frá vanligum dálkingarevnum frá brennistøðum (SO2 og HCL) liggur langt undir teimum hámarkum, ið kunnu haldast at vera hættislig. Hin vegin hevur verið ført fram, at talan eisini kann verða um vandar av øðrum ókendum evnum, herundir tungmetallum.

Frá náttúruverndarligum sjónarmiðum verður dentur lagdur á, at støðin kemur at minka um rekreativa virðið av økinum kring Toftavatn, umframt at støðin kemur at skemma landslagið. Teir íbúgvar, sum koma at búgva næst støðini, hava umframt dálkingarvandan lagt dent á, at støðin verður løgd ov nær einum íbúðarøki, og at tann nógva ferðslan til støðina kemur at skapa ótryggleika fyri børnini við vegin, sum upprunaliga var lagdur sum ein útstykkingarvegur til eitt friðarligt íbúðarøki. Yvirheilsunevndin hevur ikki grundað sína avgerð á kendar vandar frá brennistøðum, men á ókendar vandar, ið seinni kunnu koma at vísa seg, m.a. tungmetall.

Aftaná viðgerðina av málinum metir hesin parturin av nevndini, at rættasta loysnin av ruskspurninginum er at brenna tað brennbara burturkastið í eini tíðarhóskandi brennistøð, sum lýkur tær treytir, ið verða settar til slíkar brennistøðir í okkara næstu grannalondum. Fíggjarliga hevði besta loysnin verið at havt eina felags brennistøð, har Havnin eisini var við. Viðvíkjandi plaseringini av støðini heldur hesin parturin av nevndini ikki, at Fossdalsbakki kann verða nakað alternativ, tá henda plasering, um hugsast skal um Toftavatn, ikki er nøkur betri plasering enn á Saltnesi. Henda meting byggir á úttalilsir frá teimum lokalu byggimyndugleikunum og frá yvirheilsunevndini.

Hesin parturin av nevndini mælir landsstýrinum til at taka eina skjóta avgerð í málinum, sum tað metir seg hava heimild til at taka avgerð í, men áðrenn landsstýrið tekur avgerð, eigur tað at kunna seg við aðrar møguleikar til loysn av málinum. Um so verður, at landsstýrið tekur ta avgerð at staðfesta avgerðina hjá yvirheilsunevndini, eigur landsstýrið ikki bara at sleppa málinum, men at virka fyri at fáa tað loyst á annan hátt.

Frásagnirnar frá teimum fundum, ið nevndin hevur havt við feløg,

stovnar v.m., verða sendar landsstýrinum til møguliga nýtslu í sambandi við ta víðari viðgerðina av málinum.

Út frá hesum viðmerkingum setir ein helmingur av nevndini (Ivan Johannesen, Svend Age Ellefsen og Vilhelm Johannesen) fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið tekur undir við, at renovatiónsspurningurin í Føroyum verður loystur við brenning av øllum brennbarum burturkasti í tíðarhóskandi brennistøð.
2. Landsstýrinum verður álagt at fáa spurningin um bygging av ruskbrennistøð loystan beinan vegin.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at virða avgerð yvirheilsunevndarinnar um ikki at loyva bygging av ætlaðari brennistøð á Saltnesi.

Ein annar minniluti (Erlendur Patursson) hevur hesar viðmerkingar:

1. Sambært avgerð yvirheilsunevndarinnar verður ikki loyvt at byggja hina ætlaðu ruskbrennistøð IRF's á Saltnesi í Nes kommunu. Í so máta er hetta byggimál longu avgjørt. Kortini er tað hent, at avgerð yvirheilsunevndarinnar hevur verið kærd til landsstýrið, ið síðan í uppskoti til tingið hevur biðið løgtingið um góðtøku av, at tað, t.e. landsstýrið, tekur (aðra?) avgerð í hesum máli. Tað, ið sipað verður til, er helst §47 í kunngerðini frá 29. september 1969, har sagt verður: »Landsstýrið kann geva undantaksloyvi frá reglunum í hesi samtykt, tá heilsunevndin gevur umsóknini sítt tilmæli eftir at hava fingið skrivligt ummæli frá yvirheilsunevndini og kommunustýrinum.«

Tað er tó full semja um, at henda grein kann ikki nýtast sum heimild hjá landsstýrinum til at broyta avgerðina hjá yvirheilsunevndini.

Hin vegin hevur skrivstovustjóri landsstýrisins í skjali dagfest á landsskrivstovuni 7. januar 1983 kannað danska lóggávu og er har við komin til tað úrslit, at landsstýrið »hevur heimild til at taka avgerðina frá yvirheilsunevndini til viðgerðar og í givnum føri broyta hana, ja seta hana úr gildi.«

Her má tó skilast til, at hetta málsøki er eitt av teimum málsøkjum, sum eru yvirtikin sum føroysk sermál. Hvat ið donsk lóggáva sigur á hesum øki, er tí føroyskum rættarreglum óviðkomandi og kann als ikki nýtast til at seta føroyskar rættarreglur til viks. Tá ið tað í føroysku rættarreglunum, her í kunngerðini frá 29. september 1969 (ella aðrar staðir) ikki er heimild hjá landsstýrinum til at broyta avgerðina hjá yvirheilsunevndini, kann slík rættarregla ikki verða sett úr gildi við einum hvørjum donskum rættarreglum, ið als ikki hava nakað rættarligt gildi í Føroyum.

Ætla vit at verða okkara egnu føroysku rættarreglum lýdnir og ikki seta hesar úr gildi til frama fyri rættarreglur í øðrum landi, her Danmark, og har við gera til einkis tað ræði, ið vit hóast alt eiga sambært teirri stjórnarskipan, ið vit liva undir, má avgerð yvirheilsunevndarinnar standa við makt og ikki kunna broytast ella verða sett úr gildi av landsstýrinum.

Viðvíkjandi málinum í aðrar mátar er hetta at tilskila:

2. Økið kring Toftavatn er eitt av vakrastu náttúruplássum í landinum, ið eigur at verða friðað, alt sum tað er. Tað er tí skeivt, soleiðis sum umhvørvisfelagið bendir á, at fara at skemma hetta øki við ruskbrennistøð.

3. Soleiðis sum staðsetingin er ætlað, kemur henda ruskbrennistøð og vegur til hana at liggja á ætlaðum íbúðarøki. Slíkt kann ikki vera rætt. Víst verður á tey mongu mótmæli, ið komin eru frá fólkum í Runavík. Sjálvt um alt í aðrar mátar skuldi verið í lagi við staðsetingini, bæði úr heilsu- og umhvørvisligum sjónarmiðum, kann tað ikki forsvarast at treingja slíka ruskbrennistøð inn á tað fólk, ið har býr og móti vilja tess. Um so var, at henda staðseting var forsvarlig bæði úr heilsuligum og umhvørvisligum sjónarmiðum, og um so var, at júst henda staðseting var neyðug til at loysa málið um ruskbrennistøð, hevði slík loysn møguliga verið góðtikin av teimum fólkum, ið har búgva, men slíkt er jú als ikki tilfelli.

4. Tað eru aðrir spurningar, ið hanga uppi í hesum máli. Byggikostnaðurin, ið fyrst var mettur til 11 mió.kr., verður nú mettur til 40 mió.kr. ella nærum fýrfaldaður.

Viðvíkjandi rakstrarkostnaðinum eru ongar ítøkiligar upplýsingar.

Henda ætlaða ruskstøð skal bert taka ímóti tí ruski, ið kann brennast. Um annað burturkast, ið ikki kann brennast, eru ongar nágreiniligar ætlanir. Ruskmálið sum slíkt verður tí ikki loyst bert við hesi ruskbrennistøð. Enn minni vita vit nakað um kostnaðin av at beina fyri hesum partinum av burturkastinum.

Tað er eisini ivasamt, um tað er rætta loysnin at flyta rusk úr øllum Føroyum til eina felags ruskbrennistøð. Slíkt verður bæði dýrt og ólagaligt. Sum dømi kann takast tað, at rusk verður flutt úr Sumba. Fyrst við bili til Vágs ella Tvøroyrar. Haðan við skipi til Tórshavnar, so upp á land har, síðani aftur umborð á skip og inn á Toftir. Og haðan aftur við bili til Saltnes.

Tað eru aðrir møguleikar enn brennistøð at beina fyri ruski — møguleikar, ið ikki sýnast hava verið nóg gjølliga kannaðir. Nevndin hevur hugt at tyrvingarstøðini norðuri á Krossi, og riggaði hon væl. Slíkar loysnir kunnu væl saktans finnast aðrar staðir, t.d. í Suðuroy, Sandoy, Vágum og Norðuroyggjum.

5. Saman um tikið er hetta at siga:

Um so er, at mett verður, at rætta loysnin er at byggja slíka felags brennistøð, má m.a. og fyrst og fremst krevjast, at staðsetingin uppfyllir hesar treytir: 1. at støðin eftir meting heilsumyndugleikanna (yvirheilsunevndar) verður heilsuliga forsvarlig, 2. at støðin ikki skemmur náttúru ella umhvørvi, 3. at støðin ikki verður bygdá ella við íbúðarøki. Av tí at staðsetingin á Saltnesi onga av hesum trimum treytum uppfyllir, kann hon ikki góðtakast.

Minnilutin (Erlendur Patursson) setir fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at fylgja avgerð yvirheilsunevndarinnar um ikki at loyva IRF at byggja ruskbrennistøð á Saltnesi í Nes kommunu.

Skuldi landsstýrið kortini loyvt hesa staðseting, kann slíkt loyvi ikki veitast, fyrr enn meiriluti íbúgvanna í Runavíkar og Nes kommunum á almennari fólkaatkvøðu hava givið játtan til slíkt loyvi.

Ein minniluti (Frederik Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

Framhaldandi 2. viðgerð 17. mai. Uppskot frá Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Vilhelm Johannesen, pkt. 1 samtykt við 20-0, pkt. 2 samtykt við 21-0 og frá minniluta (Adolf Hansen) fall við 14-0. Uppskot frá minniluta (Erlendur Patursson) fall við 14-0.

Síðani boðaði løgmaður frá, at eftir at hava fingið víðari heimild, enn biðið var um, varð málið afturtikið.

Adolf Hansen og Hilmar Kass søgdu, at teir løgdu málið fram aftur. Hilmar Kass førdi fram, at hann kundi ikki góðtaka skilaleysu útlegging løgmans um, at samtykta uppskotið var meiri víttgangandi enn landsstýrisuppskotið, tí samtykta uppskotið frá nevndini als ikki viðger tað, landsstýrið hevur biðið løgtingið tikið støðu til. Hilmar Kass og Adolf Hansen settu tí uppskotið fram aftur.

Uppskotið hjá Adolf Hansen og Hilmar Kass fall við 5-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 899-25

---

# 77. Umrøða av arbeiðsstøðuni hjá ungfólki í Føroyum

Ár 1983, týsdagin 8. mars legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Kanningin *Arbeiðsstøðan hjá ungfólki í Føroyum, heystið 81 og várið 82,* verður tikin til umrøðu og viðgerðar á tingi.

1. viðgerð 24. mars. Uppskot um at beina málið í arbeiðaranevnd fall við 11-0, málið varð síðani beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 24. mars 1983 beint í sosialu nevndina.

Í og fyri seg er tingmálið avgreitt við tað, at orðaskifti um spurningin var við 1. viðgerð. Men av tí, at hetta er ein stórur og átrokandi spurningur, varð málið beint í nevnd við ætlan um víðari kanning og gjølligari viðgerð.

Hetta hevur nevndin ikki havt nóg góðar umstøður til og ynskir tí at halda fram við viðgerðini.

Nevndin setur tí fram hetta

## Uppskot til samtyktar

Løgtingsmál nr. 77/1982: Umrøða av arbeiðsstøðuni hjá ungfólki í Føroyum verður viðgjørt víðari í Løgtingsins sosialu nevnd í tingsetuni 1983.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið til samtyktar frá sosialu nevndini samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1307-8

# 78. Uppskot til samtyktar um løgtingsval

Ár 1983, týsdagin 8. mars legði Atli Dam, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Ásannandi, at samráðingar landsstýrisins við tær tjóðir, føroyingar samvinna við á fiskivinnuøkinum, hava borið alt ov stutt og í mongum føri hava álagt føroyskum veiðumonnum órímiligar treytir, og ásannandi, at sitandi landsstýri sum umsitingarmyndugleiki ikki megnar at greiða uppgávu sína, men eisini í ósketnari handfaring av sáttmálunum letur stórvirði fara fyri skeyti, samtykkir løgtingið at útskriva nýval, skjótast til ber.
2. Løgtingið samtykkir misálit sítt á umsiting landsstýrisins á teim økjum, har landsstýrið ikki tekur avgerðir, tí áliggur skylda til at avgreiða, so sum í renovatiónsmálinum, málinum viðvíkjandi studentaskúla í Eysturoynni og øðrum.
3. Løgtingið samtykkir misálit sítt á evnir landsstýrisins at ávirka eina neyðuga, skjóta og nøktandi vinnulívsútbygging, sum kann útvega neyðuga vøksturin í tali av arbeiðsplássum her á landi.
4. Løgtingið ásannar harafturat, at búskaparliga gongdin seinastu tvey árini við vaksandi gjaldsjavnahalli, risavøkstri í lántøkuni uttanlands og versnandi gjaldsføri løntakaranna av reallønarlækkingum so greitt er í andsvari við tað, samgongan segði seg vilja røkka, at politikkur hennara má metast ikki bert nyttuleysur, men eisini skaðiligur, tí hann rekur okkum inn í eina alsamt vaksandi kreppustøðu við uttanlandsskuld upp í 2,7 mia.kr. við árslok 1983, har bert fá arbeiðspláss eru skapt fyri vøksturin upp á 1,7 mia.kr. síðan árslok 1980.
5. Løgtingið áleggur flokksformonnunum beinan vegin — og áðrenn samtykt av 1 við aðru viðgerð — at gera avtalu um neyðturviliga lóggávu, ið røkkur nakað inn í komandi valskeið viðvíkjandi fyribils fíggjarløgtingslóg og øðrum, herundir samtykt av lækkan av valrættaraldrinum til 18 ár.

**Viðmerkingar:**
*Ad I.* Tað kemur alsamt greiðari og greiðari undan kavi, at tær avtalur, sum sitandi landsstýri hevur samráðst um við onnur lond, ikki bert hava borið minkandi veiðumøguleikar og kvotur í sær, men eisini goyma so mong lýti og avmarkingar, sum so hvørt, hesi verða avdúkað, minka munandi um møguleikar okkara at troyta tey virði, sum skuldu ligið í sáttmálunum.

Dømi um sjálvbodnar avmarkingar, vit onga skyldu høvdu at samtykkja, eru: Laksaveiðan innan egið 200 fjórðingamark, rækjuveiðan við Svalbard, lodnuveiðan við Eysturgrønland, fyriskipanin av botnfiskaveiðuni við Ísland, meskavíddirnar við Føroyar og annað.

Stóra talið av slíkum óneyðugum og skeivum avgerðum — sum hvør sjálvum sær í øðrum landi høvdu borið stjórnarskifti ella val við sær — er meira enn haldgóð grundgeving fyri at útskriva nýval við stytstu tíðarfreist.

Tað er fleiri ferðir ávíst, at landsstýrið ikki hevur gjørt sær neyðugan ómak í samráðingum sínum og hevur latið seg trýsta óneyðuga langt í avmarkingum av føroyskum møguleikum og víðkaðum ræsarúmi til útlendingar — eisini á føroyskum øki.

Hastverk landsstýrisins — sum sjáldan loyvdi neyðuga talið av samráðingarumførum til mýkjan av samráðingarstøðuni — hevur nú eisini víst seg at goyma fyrr ókendum eykaavmarkingum og hevur tí eisini borið í sær, at landsstýrið beinleiðis hevur latið seg lumpa, tí tað ikki kannaði legala grundarlagið nóg gjølla.

Prátið um laksaveiðu føroyinga á opnum havi og forhondsavtalan við EF forðaði okkum at veiða tey 1100-1200 tonsini árliga, sum samtykt okkara av laksakonventiónini helst hevði noytt aðrar at góðtikið sum okkara kvotu.

Laksakonventiónin varð mest funnin uppá fyri at fáa føroyingar við, so vit kundu lagt prísin á tá, men í staðin seldu vit EF ein sjálvbodnan niðurskurð upp á 600 tons uttan at fáa eitt oyra í endurgjaldi. Hesi 1800 toskavirðistonsini hevur EF ongantíð goldið og fer væntandi heldur ikki at gjalda.

EF-sáttmálin gevur okkum so nógv túsund tons av pappírsfiski, at vit ongantíð veiða ein brotspart av teim, tí flotin er ikki til longur. Í atgerðarloysi sínum hevur landsstýrið flutt hann heim á grunnarnar og við høpisleysa innflutningsbanni sínum latið hvørt skipið bera eina uttanlandsskuld eyka upp á 4-5 mió.kr. við sær til spekulatiónsvinningar uttan virðisskapan aftanfyri.

Fyri hetta — sum er fíggjarligt tap — rinda vit ein prís afturat, sum loyvir útlendingum víðari ræsur á føroyskum øki enn føroyingum sjálvum. Talan er um smærri meskavíddir, snørdar posar o.a., samstundis sum markini á friðaðum økjum eru trýst nærri landi.

Avmarkingin við skipatalinum til 5 í rækjuveiðu við Svalbard er so burturvið og óneyðug, at mistakið illa bøtist aftur.

Her var eina ferð »møguleikin« fyri vøkstri í føroyskari fjarfiskiveiðu. Her høvdu vit alheimssjógvin — ella sjógv teirra 40 signatarlanda — sum kundi givið okkum hundraðtals milliónir, kundi loyvt okkum at tikið rækjutrolarar heim aftur úr Grønlandi og Kanada, kundi nøkta føroyskan íløguhug, so flotin varð útbygdur av nýggjum.

Alt hetta fór fyri skeyti, tí landsstýrið (samgongan) ikki hevði hugflog — fantasi — til at hugsa sær, at »vit nakrantíð aftur fóru at byggja nýggj skip til slíka veiðu«!!

Eitt stýri, sum viðgongur, at tað ikki kann fyrigykla sær, at nýggir møguleikar finnast, og ikki kann hugsa sær, hvussu slíkir skulu troytast, ella at vit útbyggja til teirra, hevur dømt og avsagt seg sjálvt. Tí átti ikki at verið neyðugt at skotið upp fyri tinginum, at vit útskriva nýval. Hetta átti landsstýrið sjálvt at gjørt.

Seinasta prógvið um evnaloysi landsstýrisins er skeiva umsitingin av íslandsveiðuni. Nú frættist, at 5-600 tons av háverdugum botnfiski eru mist. Hesi høvdu eitt avreiðingarvirði upp á 2,75 mió. Arbeiðslønar- og skiftavslopið varð 1,5 mió. og útflutningsøkingin 5 mió.kr. Men fryktandi er fyri, at tað ikki eru 500 tons, men 1100 tons, sum mist eru, at missurin sostatt er dupult so stórur. Leggja vit so milliónahall trolaranna av at sigla túr um túr í heyst av Halanum við 60-70 tonsum, er niðurlag okkara fullkomið.

Hesi viðurskift sýna týðiliga, at vinna okkara hevur ikki ráð at lata hetta landsstýrið sita ein dag longri enn neyðugt.

*Ad 2.* Hóast klandur og støðuloysi hevur forðað sitandi samgongu at taka skilagóðar og neyðugar avgerðir í samfelags- og vinnulívsúthyggingarmálum — ja í so stóran mun, at bæði Dimmalætting og Dagblaðið hava skírt tvey ára politikkin »Visnipolitikk«, so hevði føroyski borgarin rætt til at vænta, at vanligar umsitingarligar avgerðir fór landsstýrið at kunna taka, men so hevur ikki verið.

Tað er eingin loyna, at umsóknir um vinnulívsútbyggingar, umsóknir frá borgarum, feløgum og kommunum hava hópað seg upp á skrivaraborðum landsstýrismanna, og at menn so við og við hava mist mótið um at fáa mál síni viðgjørd.

Men tá landsstýrið nú, tí tað ikki vil, megnar ella torir at fremja úrskurð í málum, tað sum kærumyndugleiki ella vanligur umsitingarmyndugleiki hevur skyldu til at avgera, men í staðin ætlar at taka løgtingið sum gísla fyri evnaloysi sítt, so eru vit komin so langt burtur frá at hava eitt ábyrgdarstýri, at hetta má bótast sum skjótast.

Eitt landsstýri skal taka tær avgerðir, tað hevur skyldu til, ynskir løgtingið tær broyttar, kann tað lóggeva á økinum, men tað hoyrir ikki heima, at landsstýrið biður løgtingið umsita sína vegna, tað er landsstýrið, sum umsitur løgtingsins vegna. Er tað ikki fört fyri hesum, leggur tað frá sær.

*Ad 3.* Leitandi fjálturskenda og tíðarkrevjandi toganin um útbyggingarmál og um stýring av vinnulívi okkara, sum samgongan hevur fingist við í tvey ár, hevur m.a. tarnað útbyggingini av svarkjaftaveiðu- og viðgerð óneyðuga leingi, somuleiðis troytanini av dýpunum.

Siglingarmøguleikarnar hevur samgongan seinkað óneyðugt í tvey ár, alt meðan tann útbygging, sum kortini fer fram, leggur óneyðugar byrðar á skattaborgaran.

Hetta er ein sannroynd, borgarin kennir seg hava í dag, tað er tó rímiligt, at hann fær høvi til at siga hugsan sína, og ger hann frægast hetta við valborðið.

*Ad 4.* Tað stendur longu greitt, at politikkur samgongunnar, tær avgerðir, tiknar eru, tey veðhald, bundið er at, og tey gjaldjavnahall, verið hava, og hallið, vit í 1983 merkja, at vit fáa eina uttanlandsskuld við árslok 1983 upp á 2,7-3 mia.kr.

Hetta hendir, hóast stýrið hevur skert forbrúksmøguleikar vanliga løntakarans meira, enn nakað stýri fyrr hevur gjørt. Toll- og avgjaldsskrúvan er snarað so hart sum ongantíð fyrr, og ongantíð er tikið so nógv inn í kassan sum nú. Kortini eru forbrúksmøguleikar teirra, sum samfelagsorkan verður flutt til, størri enn nakrantíð.

M.a. tí veksur gjaldsjavnahallið støðugt.

Ein 5% vøkstur í útflutningsvirði er ikki nær til nóg mikið at uppvega innflutningsvøksturin, og má hetta merkja, at tað er skeivur politikkur, rikin verður.

Hesin má broytast ongantíð ov skjótt, skulu ikki komandi ættarlið verða so skerd í møguleikum sínum, at tey fáa ikki livað her á landi.

*Ad 5.* Tað er neyðugt, at ein fíggjarlóg, sum røkkur nakað inn

í fíggjarárið við heimild til neyðuga nýtslu, er samtykt, áðrenn tingið uppleysir seg sjálvt.

Eitt nýtt landsstýri kann so leggja endurskoðað uppskot fyri tingið, tá tað hevur mett um støðuna.

Helst verður eisini neyðugt at fremja aðrar átrokandi fyribilslóggávur, sum m.a. viðvíkja samskifti okkara við útheimin.

Valrættaraldurin er semja um at lækka, og skal hann samtykkjast av tveimum ymsum løgtingum.

Hetta mugu flokksformenninir avtala soleiðis, at tingsetan gerst so stutt sum gjørligt. Helst bert í 1-2 vikur afturat.

Harumframt hevði verið skilagott, at flokksleiðararnir og løgtingið gjørdu greitt, at ein av orsøkunum til, at val verður, er, at endursamráðing má roynast av nýggjum landsstýri, fyri at bøta um verstu brekini í ymsum veiðusáttmálum.

1. viðgerð 11. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

23. mars legði Tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

**Álit**

Tjóðveldisflokkurin vil hava hetta ófrælsis- og afturhaldsstýri, ið nú situr, frá — og tað sum skjótast. Eyðvitað. Tær ólukkur, ið tað hevur framt í stívliga tvey ára stjórnartíð síni, eru so sjónskar og miklar, at tað er onga tíð ov skjótt at fáa tað frá.

Í hesum er Tjóðveldisflokkurin samdur við Javnaðarflokkin. Tað, ið Tjóðveldisflokkurin saknar í hesum máli Javnaðarfloksins, er hin vegin ábending um, hvat ið Javnaðarflokkurin ætlar, at koma skal í staðin fyri tann politikk, ið núverandi landsstýri rekur.

Tjóðveldisflokkurin hevur góðar grundir til at spyrja um hetta.

Tað var jú Javnaðarflokkurin, sum saman við Sambandsflokkinum bant okkum í ta ófrælsu stjórnarskipan, ið vit enn liva við, og í fjøld av árum hevur Javnaðarflokkurin havt politiska samvinnu við henda ófrælsis- og afturhaldsflokk.

Tó at tað skuldi eydnast at kollrenna tað ófrælsis- og afturhaldsstýri Sambandsfloksins, Fólkafloksins og Sjálvstýrisfloksins, sum nú situr, hava vit — við politisku fortíð Javnaðarfloksins í huga, ongan sum helst tryggleika fyri, at vit ikki fáa nýtt ófrælsis- og afturhaldsstýri, har Sambandsflokkurin skiftir út aftur Fólkaflokkin og leitar aftur til gamla samstarvsflokk sín, Javnaðarflokkin. Og, sum vera

man, verður Sjálvstýrisflokkurin — um á skuldi staðið — altíð tøkur.

Tá er einki vunnið. Er tað hetta, ið Javnaðarflokkurin vil, so er Tjóðveldisflokkurin ikki við.

Tjóðveldisflokkurin vil hava annað landsstýri enn hetta, ið nú situr, men hann vil eisini — og ikki minni — hava annan politikk, ið nú verður rikin.

Tað eru nøkur aðalmál, ið Tjóðveldisflokkurin metir at hava hráðskund at fáa loyst, og eru tey hesi:

1. Samtykt løgtingsins frá 17. apríl 1975 um yvirtøku av undirgrund og havbotni eigur nú uttan nakra sum helst slaking at verða sett í verk.
2. Slíkar broytingar verða gjørdar í stjórnarskipan okkara, at føroyingar fáa føroyskan heimarætt samhært tjóðskapi sínum staðfestan, at móðurmálið verður einasta loyvda mál í almennum viðurskiftum, at føroyingar fáa føroyskt pass, at øll okkara uttanríkismál koma á føroyskar hendur.
3. Núverandi skipan viðvíkjandi donskum peningaveitingum til Føroya verður útskift við »blokkstudningsskipan«, soleiðis at hesar veitingar minka, so hvørt sum ræði landsstýris og løgtings veksur.
4. Hin skeiva gongd, sum nú er í vinnulívs- og íløgupolitikkinum verður steðgað, og í staðin verður lagdur til rættis vinnulívs- og íløgupolitikkur við tí høvuðsendamáli at fremja vinnulívsíløgur í fiskifør og fiskavirkir, soleiðis at vit fáa fult og varandi virði burtur úr tí fiskiríkidømi, ið landleiðin hevur at geva okkum, og soleiðis at vit sleppa undan dýrgoldnari fiskiveiði á fjarleiðunum.
5. Tjóðveldisflokkurin vendir sær móti tí ágangi, ið framdur verður móti tí frælsa vinnulívinum, og serstakliga móti teirri miðsavning, ið fram fer í fiskivinnurakstrinum, og leggur áherðslu á, at veiðimenninir sjálvir reka frælsa og sjálvstøðuga vinnu á egnum veiðiførum.
6. Tær árásir, ið nú við nýggju prístalslógunum og við øðrum atgerðum verða framdar móti láginntøkufólkinum, verða steðgaðar. Í staðin verður hesum stættum veitt full trygd móti vaksandi dýrtíð og livikostnaði.
7. Heilt nýggja skattaskipan, ið veitir trygd fyri, at hvør einstakur letur skatt eftir veruligu inntøku síni.
8. Heilt nýggja sosial- og heilsuskipan lagað eftir fólksins tørvi og landsins egnu viðurskiftum.
9. Landsbankin verður settur á stovn og fingin at virka.

Tá ið Tjóðveldisflokkurin greiðir atkvøðu við uppskoti Javnaðarfloksins um misálit á núverandi landsstýri og um nýtt løgtingsval, er tað við tí í huga at fáa landsstýri og samgonu her á tingi, ið m.a. setir sær sum endamál at fremja tey aðalmál, ið her hava verið nevnd.

2. viðgerð 11. apríl, framhald 12. apríl. Pkt. 1 fall við 13-0.

F.L.j.nr. 700-3-9

---

# 79. Lóg um viðurkenning av norðurlendskum faðirskapsavgerðum

Ár 1982, fríggjadagin 11. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til samtyktar**

Løgtingið samtykkir við kongaligari fyriskipan at seta §§ 1, 4 og 6 í lóg nr. 158 frá 6. mai 1980 »om anerkendelse af nordiske faderskabsafgørelser og om ændring af lov om anerkendelse og fuldbyrdelse af nordiske afgørelser om privatretlige krav« í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Áðrenn henda lóg og tilsvarandi lógir í hinum norðanlondum komu í gildi, vóru ongar vanligar reglur um viðurkenning av útlendskum avgerðum í hjúnarættarliga økinum.

Lógirnar um viðurkenning av norðurlendskum faðirskapsavgerðum er eitt lið í tí norðurlendska samarbeiðinum. Reglurnar í teimum norðurlendsku barnalógunum um áseting og avtøku av faðirskapi og um viðgerð av faðirskapsmálum byggja á somu prinsipp.

At avgerðir verða viðurkendar, vil siga, at tær uttan at verða eftirkannaðar kunnu leggjast til grund undir øðrum avgerðum, har faðirskapsspurningurin er av týdningi, t.d. viðvíkjandi spurninginum um arv, navn og undirhald.

§5 í lógini, sum ikki verður mælt til at seta í gildi, viðvíkir broyting av eini lóg, sum ikki er sett í gildi í Føroyum.

1. viðgerð 18. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 11. mars 1983 og við 1. viðgerð 18. s.m. beint í lóganevndina.

Eftir lógini koma dómar, rættarsemjur og aðrar ásetingar um faðirskap at verða viðurkendar í Føroyum og harvið at verða lagdar til grund undir øðrum avgerðum, har faðirskapurin er av týdningi, t.d. við arv, navn og undirhald.

Undir nevndarviðgerðini hevur spurningurin um politiavhoyring av kvinnum, ið hava fingið barn uttan fyri hjúnalag, verið umrøddur, og minnir nevndin á áheitanina í tingmáli nr. 55/1980 um at kanna, um tað ikki er gjørligt at fáa hesar reglur broyttar.

Vísandi til frammanfyri standandi mælir nevndin tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 529-2.

# 80. Val av álitsmonnum og nevndum

Ár 1983, fríggjadagin 11. mars varð málið framlagt. 25. mars fór valið fram, sí bls. 6.

---

# 81. Broytingar í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini

Ár 1983, fríggjadagin 11. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri Fólkatingið hjáløgdu uppskot til »Lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg«, t.e. skjal 1, sum broytt í skjali 2, og »Lov om ændring af lov for Færøerne om børneforsorg«, skjal 3.

**Viðmerkingar:**
Við løgtingsmáli nr. 12/1982: Broytingar í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini, legði landsstýrið 8. september 1982 fyri løgtingið uppskot til samtyktar um nevndu báðar lógarbroytingar. Málið varð framlagt 9. september 1982, men afturtikið av landsstýrinum 16. september 1982.

Landsstýrið hevur nú samtykt at leggja málið fyri løgtingið av nýggjum við tí broyting, at stuðulin í sambandi við tvørrandi arbeiðsmøguleikar verður avmarkaður til 125% av fólkapensjónini og 125% av barnastudninginum, og annars við niðanfyri standandi viðmerkingum.

Í 1976 kom í Danmark í gildi hjálparveitingarlóg (bistandslov) í staðin fyri forsorgarlóg og barnaforsorgarlóg.

Hjálparveitingarlógin hevði við sær ymsar broytingar, sum kunnu býtast í tvey.

Í fyrstu syftu hevði lógin við sær fyrisitingarligar broytingar, serliga soleiðis at tey, sum høvdu tørv á hjálp, ikki skuldu fara til nógvar ymsar stovnar, men bert til viðkomandi kommunu.

Í aðru syftu vórðu gjørdar broytingar, sum miðaðu ímóti, at tey, sum tørvaðu hjálp, kundu fáa betri ella størri hjálp.

Tá var nógv orðaskifti, um broytingin av lóggávuni var hóskandi yvirhøvur og um reglurnar svaraðu til endamálið.

Landsstýrið tók ta støðu ikki at fara undir at gera eina hjálparveitingarlóg galdandi fyri Føroyar, men at bíðast skuldi eftir royndunum í Danmark. Á fyrisitingarliga økinum var ikki so stórur tørvur á broytingum sum í Danmark, tí øll sosiala umsitingin var savnað á einum staði, nevniliga á Almannastovuni, við undantak av sosialu umsitingunum í kommunum við yvir 2000 íbúgvarum. Hin vegin helt landsstýrið, at hjálp til tey, sum tørvaðu hana, átti at víðkast í ávísan mun, og at tað mest hóskandi var at lata hetta fáa skap av broytingum í verandi forsorgarlóg.

Í galdandi lóg eru reglur í §15 í forsorgarlógini um veitan av víðkaðari hjálp í ávísum førum, tá sjúka berst á, men eru treytirnar heldur strangar. Tá hesar strongu treytir eru loknar, verður hjálp veitt (útroknað) á tann hátt, at avsett verður peningaupphædd (grundupphædd av fólkapensjónini), og verða haraftrat lagdar fastar útreiðslur hjá viðkomandi.

Um viðkomandi ikki kemur undir §15, kann hjálp veitast støkum uppihaldarum eftir §22.

Um viðkomandi ikki kemur undir §15 ella §22, og annars í øllum førum, har viðkomandi ikki kemur undir serligar reglur í almannalóggávuni (avlamispensjón, dagpening og endurbúgving), fær viðkomandi hjálp eftir §9 í forsorgarlógini.

Hjálpin eftir §9 (og §22) hava í at kalla øllum førum somu støddsum grundupphæddin av fólkapensjón við pensjónsviðbót og møguligari barnaviðbót.

Tá talan er um arbeiðsloysi, eru reglurnar í §9 galdandi, og bera tær

í sær, at hjálpin er heldur lág, og at inntøkan hjá hjúnafelaga verður drigin frá krónu fyri krónu.

Høvuðsbroytingin í uppskotinum er, at partur av teimum, sum nú bert kunnu fáa lítla upphædd, eftir §9 í uppskotinum kunnu fáa fyribilshjálp avmarkað til hægstu upphæddina fyri sjúkradagpening, og onnur kunnu fáa fyribilshjálp, sum er 125% av fólkapensjónini við ískoytum.

Í trongstøðu kunnu reglurnar í §9 nýtast vegna arbeiðsloysi.

Millum tey, sum í løtuni fáa hjálp eftir §9, eru nøkur fólk, sum av ymsum orsøkum megu haldast hava varandi tørv á hjálp, sjálvt um tey ikki koma undir t.d. avlamispensjón, og koma tey undir §13 í uppskotinum um varandi hjálp, sum er tann sama, sum hjálp eftir §9 er nú. Hin vegin er tann hægra hjálpin eftir §9 í uppskotinum avmarkað til tey, sum kunnu haldast bert at tørva hjálp eitt avmarkað tíðarskeið.

Nýggja orðingin av §33 í uppskotinum hevur møguleika fyri, at kommunur, ið yrkja tað, kunnu taka sær av sosialu umsitingini, og samsvarar hetta við løgtingssamtyktina í løgtingsmáli nr. 94/1975.

Annars er tað umráðandi, at tey, sum tørva hjálp, fáa somu viðgerð, tá nýggja skipanin kemur í gildi, og líka mikið, hvar tey búgva.

Sambært broytingina av §32, stk. 1, í forsorgarlógini, kann landsstýrið sjálvt taka støðu til stovnseting av stovnum. Hetta samsvarar við §34 í avlamispensjónslógini, sum heimilar landsstýrinum at seta á stovn stovnar, har ríkisstýrið uttan samráðing rindar helvtina av rakstrarútreiðslunum. Hin vegin skal landsstýrið sambært §40, nr. 7 í forsorgarlógini, sum ikki verður broytt innihaldsliga í uppskotinum, samráðast við ríkismyndugleikarnar um gjald av rakstarútreiðslunum av stovnum, ið verða skipaðir eftir hesi lóg.

Tað er ein fyritreyt hjá landsstýrinum, at býtið av rakstrarútreiðslunum millum landið og ríkið ikki verða broyttar av nýggju orðingini.

Meirútreiðslurnar av hesum uppskoti verða mettar til 6 mió. kr., ið verða býttar við 1,1 mió. kr. til statin og 4,9 mió. kr. til landskassan. Haraftrat koma útreiðslur til økta umsiting á Almannastovuni, umleið 0,4 mió. kr. til 3 starvsfólk, og umleið 2-300.000 kr. í øktum fyrisitingarútreiðslum hjá kommununum. Annars verður víst til viðmerkingarnar, sum almannamálaráðið hevur gjørt.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt hin 11. mars 1983 av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 23. mars 1983 beint í sosialu nevndina.

Undir viðgerðini býtti nevndin seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Eli Nolsøe, Frederik Olsen og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Hilmar Bech og Karin Kjølbro) átalar, at landsstýrið hevur drálað so leingi við at fáa framt tiltrongdar broytingar í forsorgarlógini og í barnaforsorgarlógini.

Hetta drál hevur ført við sær, at veitingaruppæddirnar als ikki røkka til lívsins uppihald hjá teimum, sum fáa forsorgarhjálp eftir §§9, 15 og 22.

Sum dømi kann verða víst á, at eini hjún í dag, sum fáa hjálp eftir §9, í mesta lagi kunnu fáa útgoldnar um mánaðin kr. 4.525,- + kr. 512,- fyri hvørt barnið, meðan støk í mesta lagi fáa kr. 3.017,- um mánaðin.

Hetta dømi vísir, at eingin kann klára seg við hesari hjálp uttan at koma í fíggjarligt óføri, og er tað tí landsstýrisins ábyrgd, at nógv fólk eru komin í skattaeftirstøðu og ikki fáa rindað rentur og avdráttir. Eftir uppskoti landsstýrisins hækka veitingarnar við 25%. Hetta er ein bati, men fólk koma støðugt í hesum ári í skattaeftirstøðu.

Í seinastuni hevur tikið seg upp arbeiðsloysi víða hvar í landinum. Tann einasti møguleiki, tey arbeiðsleysu hava fyri at fáa peningaligan stuðul, er hjálp eftir §9 í forsorgarlógini, ein hjálp, ið, sum ávíst, ikki røkkur til allar vanligar útreiðslur, og sum als ikki kann metast sum endurgjald fyri arbeiðsloysi.

Tað er tí umráðandi, at tað ikki verður drálað longur við at seta tær broytingar í gildi, sum uppskotið umfatar, og mælir minnilutin tí løgtinginum til at samtykkja upprunaliga uppskotið, sum á sinni varð framlagt av landsstýrinum og síðani tikið aftur, og sum nú liggur sum skjal 1 og 3 í uppskotinum.

Minnilutin mælir annars til, at bæði forsorgarlóg og barnaforsorgarlóg verða endurskoðaðar, so tær betur hóska við føroysk viðurskifti.

Í hesum sambandi kann verða víst til, at í Danmark eru hesar lógir langt síðani broyttar.

Nógv tilfar er til taks um hesi viðurskifti, eitt nú frá arbeiðsbólkum, sum virkaðu í ST-barnaárinum og í ári teirra brekaðu.

Eisini eigur at verða hugsað um, at tað framvegis ongar reglugerðir eru til hesar lógir.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

## Uppskot til samtyktar

Løgtingið setir eina nevnd við 5 limum við fólki úr umsitingini hjá landi og kommunum at endurskoða forsorgarlógina og harna-forsorgarlógina í samráð við avvarðandi myndugleikar, herundir donsku-føroysku sosialu nevndina, brúkarar og barnaverndarnevndir við tí fyri eyga at gera uppskot til lógir, ið hóska til okkara viðurskifti við tørvandi reglugerðum, so ikki er ivi um, hvussu lógirnar skulu tulkast.

2. viðgerð 27. apríl. Uppskot landsstýrisins samtykt við 18-0 atkvøðum, uppskot frá minniluta í sosialu nevndini (Hilmar Bech og Karin Kjølbro) fall við 13-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-5

---

# 82. Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir

Ár 1983, fríggjadagin 11. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir**

§1. Í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti við seinni broytingum verður §4, 1. stk. orðað soleiðis:

»Tilskilað skal vera í lærusáttmálum, undir hvørjum lønartreytum lærlingurin skal arbeiða í lærutíðini. Lærlingalønirnar verða ásettar av yrkisfeløgunum ella víðkaða læruráðnum, um so er, at yrkisfeløgini ikki hava ásett lønirnar. Í handverksfakinum verða lærlingalønirnar tó einans ásettar av víðkaða læruráðnum, og verða hesar at prístalsviðgera eftir løgtingslógini um prístalsviðgerð av arbeiðslønum. Landskassin endurrindar lærumeistarunum 50% av lógásettu lærlingalønini, meðan lærlingarnir ganga á tekniskan skúla.«

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om lærlingeforhold.**

§1. I lagtingslov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold med senere ændringer affattes §4, stk. 1 således:

»Det skal i kontrakten bestemmes, på hvilke lønningsvilkår lærlingen skal arbejde i læretiden. Lærlingelønningerne fastsættes af erhvervsorganisationerne eller det udvidede læreråd, såfremt erhvervsorganisationerne ikke har fastsat lønningerne. I håndværksfagene fastsættes dog lærlingelønningerne kun af de udvidede læreråd, og bliver disse lønninger at pristalsregulere efter lagtingsloven om pristalsregulering af arbejdsløn. Landskassen refunderer læremestrene 50% af den lovpligtige lærlingeløn, me-

dens lærlingerne går på teknisk skole.«

§2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

*Stk. 2.* Til nýggjar lønir verða ásettar av víðkaða læruráðnum fyri handverkslærlingar, galda núverandi lønarreglur.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

*Stk. 2.* Til nye lønninger bliver fastsat af de udvidede læreråd for håndværkslærlinge, gælder de nuværende lønningsbestemmelser.

**Viðmerkingar:**

Seinast málið um prístalsviðgerð av lærlingalønum var til viðgerðar í løgtinginum (løgtingsmál nr. 23/1982) varð tað aftursent landsstýrinum við áheitan um at leggja fram lógaruppskot um broytingar í lærlingalógini samsvarandi álitinum, t.v.s. »at broyta lærlingalógina soleiðis, at lærlingalønir verða ásettar av yrkisfeløgunum ella víðkaða læruráðnum, og at lærlingalønirnar verða prístalsviðgjørdar eftir løgtingslógini um prístalsviðgerð av arbeiðslønum.«

Landsstýrið hevur latið gjørt uppskot samsvarandi løgtingssamtyktini.

Lærlingafelagið tekur ikki undir við hesum uppskoti, men krevur, at lærlingalønin framvegis verður knýtt at handverkaralønini sum ein prosentpartur av bruttolønini pr. dato og regulerað soleiðis, at teir fáa somu dýrtíðarviðgerð sum sveinarnir.

Føroya Læruráð, ið hevur havt málið til ummælis, mælir frá, at ásetingin av handverkslærlingalønunum verður løgd aftur til víðkaða læruráðið, tá ráðið metir tað verða hættisligt at taka upp eina skipan, sum fyrr hevur víst seg ikki at rigga.

Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag hava havt uppskotið til ummælis, men er bert svar komið frá handverkarafelagnum, sum hevur somu støðu sum lærlingafelagið.

Um lærlingalønin skal verða knýtt at handverkaralønini og samstundis fáa fulla prístalsviðgerð, kemur so við og við prosentvísi munurin millum handverkaralønina og lærlingalønina at minka. Eisini má roknast við, at onnur, sum eru lønt við prosent- ella brotsparti av fullari løn fara at krevja tað sama, t.d. aðrir lærlingar, arbeiðsfólk undir 17 ár.

Viðlagda uppskot til broytingar í lærlingalógini samsvara við lyftið frá politisku flokkunum til Handverkslærlingafelagið um, at handverkslærlingalønir skuldu fáa fulla prístalsviðbót. Eftir uppskotinum verður lønin tó ikki knýtt beinleiðis upp í handverkaralønina, men kann frítt ásetast av viðkaða læruráðnum.

1. viðgerð 23. mars, framhald 24. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 17. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið var framlagt av landsstýrinum tann 14. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í lógarnevndina.

Handverkslærlingalønirnar eru nú ásettar við løgtingslóg til ávísar prosentpartar av galdandi sveinalønum. Eftir uppskotinum skulu handverkslærlingalønirnar ásetast av viðkaða læruráðnum og prístalsviðgerast eftir lógini um prístalsviðgerð av arbeiðslønum, t.v.s. at tær skulu fáa fulla prístalsviðgerð.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Føroya Lærlingafelag, Føroya Handverkarafelag og Læruráðið um málið.

Lærlingafelagið ynskir, at lønarreglurnar verða soleiðis, at lærlingar fáa núgaldandi prosentpart av tí í dag galdandi sveinaløn og sama prosentpart av sáttmálahækkingum hjá sveinunum og harumframt fulla dýrtíðarviðbót, t.v.s. 60 oyru um tíman fyri hvørji 3 stig, prístalið hækkar. Hetta førir við tíðini við sær, at munurin í prosentum millum lærlingalønina og sveinalønina kemur at minka. Felagið metir, at fyri ein 4. árs lærling, sum nú fær 55% av sveinalønini í løn, aftaná 6 ár kemur at fáa 65% og um 12 ár 75% av sveinalønini. Verður lærlingalønin mett at hækka ov nógv í mun til sveinalønina, helt felagið, at Læruráðið kundi seta hana niður aftur ímóti teimum 55%. Felagið ynskir eisini, um Læruráðið skal áseta lønirnar, at tað fær fastar reglur at ganga eftir.

Føroya Handverkarafelag tekur undir við uppskotinum hjá Lærlingafelagnum.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur skrivliga sagt frá, at tað ikki heldur tað vera rætt bert at taka einstakar partar úr lógini, í hesum føri prístalsviðgerðina, men eigur lærlingalógin at verða tikin sum ein heild og ført ajour, tí eftir felagsins meting er hon í dag ótíðarhóskandi.

Formaðurin í Læruráðnum segði, at um lógin kemur at áseta, at Læruráðið skal áseta lønirnar, so verður hetta gjørt, men vísti hann

á, at hetta ikki altíð hevði virkað so væl.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Øssur Dam Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskotið hjá landsstýrinum.

Minnilutin (Petur Reinert og Jona Henriksen) vil vísa á, at í prinsippinum eru flokkarnir fyri, at allar lønir fáa somu peninga-upphædd við prístalshækkingar.

Við vissum rætti kann sigast, at handverkslærlingar hava samráðingarrætt, men samstundis má vísast á, at verkfallsrætt eiga teir ongan. Niðurstøða meirilutans um at mæla til at stytta um lærutíðina kann minnilutin als ikki taka undir við.

Minnilutin vísir á tann stóra týdning fyri samfelag okkara, sum góður handverkarastættur hevur havt, hevur og kemur at hava.

Samstundis mugu vit ásanna, at tað er av avgerandi týdningi, at læruviðurskifti handverkslærlinga gerast so trygg og góð sum gjørligt. Fyri at fáa støðuga tilgongd til okkara handverkarastætt og bøta um sosialu og útbúgvingarstøðu handverkslærlinga setir minnilutin tí hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Øll viðurskifti lærlinga, lønarlig, fakfelagslig og útbúgvingarlig, verða tikin til viðgerðar á Føroya løgtingi í Ólavsøkutingsetuni í ár.

2. viðgerð 17. mai, atkvøðugreiðsla 18. mai. §1 samtykt við 22-0 atkvøðum, §2 við 20-0. Uppskot til samtyktar fall við 15-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1300-6-3. Lóg nr. 67 frá 30. juni 1983.

# 83. Broyting í motorgjaldinum

Ár 1983, fríggjadagin 18. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m. verða gjørdar fylgjandi broytingar:

1) Í §4, 1. stk., verður skoytt uppí sum 3. og 4. pkt.:

»Gjaldið verður goldið frá og við tí mánaðinum, sum skráseting fer fram í. Við skráseting aftan á 15. í einum mánaði verður gjaldið tó roknað frá 1. í næsta mánaði.«

2) §6, 3. stk., verður orðað soleiðis:

»Við eigara (brúkara) skifti og tá ið avgjaldsseljari hevur tikið akfarið aftur, kemur eisini tann nýggi eigarin (brúkarin) ávikavist avgjaldsseljarin undir gjaldið fyri tað gjaldsskeið, sum eigara- (brúkara-) skiftið ella avgjaldsseljarafturtøkan er farin fram.«

**§2.** Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1983 at rokna.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om vægtafgift af motorkøretøjer.**

§1. I lagtingslov nr. 38 af 31. marts 1982 om vægtafgift af motorkøretøjer m.m. foretages følgende ændringer:

1) I §4, stk. 1, tilføjes som 3. og 4. pkt.:

»Der svares afgift fra og med den måned, hvori registrering finder sted. Ved registrering efter den 15. i en måned beregnes afgiften dog først fra den 1. i den følgende måned at regne.«

2) §6, stk. 3, affattes således:

»Ved ejer (bruger) skifte og ved afbetalingssælgers tilbagetagelse af køretøjet på hviler afgiften for den afgiftsperiode, i hvilken ejer (bruger) skiftet eller tilbagetagelsen har fundet sted, tillige den nye ejer (bruger), henholdsvis afbetalingssælgeren.«

§2. Denne lov har gyldighed fra den 1. april 1983 at regne.

**Viðmerkingar:**
Við løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 eru ásettar reglur um vektgjald av motorakførum v.m.

Ávísir trupulleikar hava tikið seg upp viðvíkjandi innkrevjingini av vektgjaldinum orsakað av, at nakrar reglur í lógini ikki eru greitt orðaðar. (Lógaruppskotið miðar ímóti at gera hesar reglur greiðar.)

**Til §1. nr. 1**
§4, 1. stk., í lógini viðvíkir gjaldskeiðinum. Hetta er fyri ávís akfør sett til 12 mánaðir frá 1. apríl til 31. mars, meðan tíðarskeiðið fyri onnur akfør er sett til 6 mánaðir frá 1. apríl til 30. september og frá 1. oktober til 31. mars.

Lógin sigur tó einki um longdina av gjaldskeiðinum, tá ið skráseting fer fram í einum gjaldskeiði.

Skotið verður upp, at tá ið skráseting fer fram í einum gjaldskeiði, verður avgjald kravt frá og við tí mánaðinum, skrásett verður, tó soleiðis, at við skráseting seinni enn 15. í mánaðinum skal avgjald rindast frá 1. í næsta mánaði.

**Til §1, nr. 2**
§6 í lógini ásetur reglur um, hvør skyldar avgjaldið, og §6, 1. stk. tilskilar sum vanliga reglur, at gjaldið skyldar hann, í hvørs navni akfarið er skrásett, tá ið gjaldið fellur til gjaldingar.

Tað framgongur av fyrireikingararbeiðinum til lógina og eisini óbeinleiðis av ávísum reglum í lógini, at ætlanin hevur verið, at avgjaldsskyldan við eigara (brúkara) skifti í einum gjaldskeiði eisini skuldi liggja á nýggja eigaranum (brúkaranum). Ein slík regla, sum kemur innkrevjingini av avgjaldinum til gagns, av tí at tað millum annað førir við sær, at nummarspjøldrini skulu verða tikin av akfarinum, um nýggi eigarin ikki rindar gjaldið.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina,. sum 27. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 24. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 11. apríl 1983 viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

Tó er nevndin ikki nøgd við orðingina í §1, pkt. 2), har orðið »av-

gjaldsseljari« eigur at verða broytt, og somuleiðis seinni í somu § »avgjaldsseljaraafturtøkan« heldur ikki riggar.

Trupulleikin er, at »avgjald« og danska orðið »afbetaling« ikki hava sama týdning í dag. Neyðugt er at undirstrika, at talan er um handilsviðurskifti, og verður tí sett fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í §1, pkt. 2) verður §6, 3. stk. orðað soleiðis:<br>»Við eigara-(brúkara-)skifti, og tá avgjaldshandilsseljari hevur tikið akfarið aftur, kemur eisini tann nýggi eigarin (brúkarin) á-vikavist avgjaldshandilsseljarin undir gjaldið fyri tað gjalds-skeið, sum eigara-(brúkara-)skift-ið ella avgjaldshandilsseljara-afturtøkan er farin fram.« | I §1, pkt. 2) formuleres §6, stk. 3 således:<br>»Ved ejer-(bruger-)skifte og ved afbetalingssælgers tilbagetagelse af køretøjet påhviler afgiften for den afgiftsperiode, i hvilken ejer-(bruger-)-skiftet eller til-bagetagelsen har fundet sted, til-lige den nye ejer (bruger), hen-holdsvis afbetalingssælgeren.« |

2. viðgerð 2. mai. Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til § 1 samtykt við 26-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 26-0.

3. viðgerð 4. mai. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 407-2-5. Lóg nr. 49 frá 20. mai 1983.

# 84. Dýping av ytra polli og gerð av pieri í Skopun

(lm. 66/1981)

Ár 1983, fríggjadagin 18. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. december 1982 og undir 1. viðgerð 10.í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur sum millumtinganevnd viðgjørt málið og hevur m.a. verið í Skopun og viðgjørt málið á fundi saman við Skopunar bygdarráð.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um leingjan av pierinum Úti á Bergi o.ø. í Skopun.** | **lagtingslov om forlængelse af pier Úti á Bergi m.m. i Skopun.** |
| **§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at leingja pierin á Bergi við 15 m og at leggja grótkast norðan fyri molan á Bergi. | **§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at forlænge pieren á Bergi med 15 m og at placere stenkast nord for pieren á Bergi. |

§2. Heimilað verður eisini landsstýrinum landskassans vegna at læna upp til 8 mió. kr. í sambandi við fremjingina av teimum í §1 nevndu arbeiðum.

§2. Landsstyret bemyndiges ligeledes til på landskassens vegne at låne indtil 8 mio. kr. i forbindelse med realiseringen af de i §1 nævnte arbejder.

§§3, 4 og 5 verða óbroyttar.

Nevndi meiriluti ger vart við, at um neyðugt verður at gera grótkast út á Boðan, skal hesin møguleiki verða hildin opin. Á fíggjarløgtingslóg 1983/84 verða 5 mió. kr. at seta til nevnda endamál.

Minnilutin (Atli P. Dam) harmast um, at byggiætlanin, sum útboðin varð í 1980 — sambært løgtingslóg nr. 72 frá 29. mai 1980, ikki varð framd orsakað av, at 4 mió. kr. vóru á muni ímillum tilboðskostnað (52 mió. kr.) og játtan (48 mió. kr.).

Í staðin fyri at játta nevndu 4 mió. kr. stegðaði nýggja samgongan byggingini og helt aðra kós viðvíkjandi Skopunar havn.

Bygt er fyribils fyri út við 25 mió. kr. í 1981 og 82, og biður landsstýrið nú um heimild at nýta aðrar 35 mió. kr. til eitt projekt, ið er minni enn tað í 1980 útbodna, men framt eftir somu høvuðssjónarmiðum sum tá.

Útrokningar landsverkfrøðingsstovnings sýna tó, at projektið í dag ikki letur seg fremja fyri 35 mió. kr., men heldur kemur at kosta 49,7 mió. kr. Leggja vit príshækkan í byggitíðini afturat, kemur tað at kosta 55-60 mió. kr.

T.v.s. at vit í staðin fyri bygging fyri 52 mió. kr. í 1980 — sambært fast tilboð — nú fremja eina bygging fyri 80-85 mió. kr. Eina bygging, sum er minni í vavi, men sum kortini brýtur frá 1980-ætlanini við portri og eitt sindur størri dýpi inni í havnini.

Undir viðgerðini av málinum hevur landsverkfrøðingurin gjørt greitt, at minni rúmkan av Ytra Polli enn hon, ið svarar til sonevnda projektið V1,5 er ikki ráðilig at fremja, skal nóg mikið av tilfari fáast til vega til grótkast, pierstøði o.a., og skulu umstøðurnar at »manøvrera« á Pollinum verða forsvarligar.

Henda víðkan er minni enn tann í 1980 útbodna, men kann minnilutin kortini taka undir við henni.

Metingar hava verið gjørdar viðvíkjandi einum grótkasti á ytru síðu av molanum norðuri á Bergi til tess at taka megina burtur úr brotinum, ið á vesturættunum tekur seg upp norðuri á boðanum og lutvíst brýtur um molan, lutvíst snarar um molaendan og skapar ókyrru í innsiglingini á Pollin.

Hesar metingar vilja vera við, at grótkastið kann bøta um innsiglingarviðurskiftini á Ytra Polli og taka burtur brotið, sum nú endar á »Reyðafýri«.

Slíkt grótkast kostar 4,5 mió. kr. at leggja, men trygd er ikki fyri, at tað verður liggjandi. Serliga verður torført at tryggja landnyrðingshornið, har vandi er fyri, at klettarnir verða tiknir suður við molanum út á dýpið.

Eisini er vandi fyri, at nakað av gróti við molarótina verður tikið norður í slokuna nærri landi.

Kortini er hett grótkast so mikið bíligt og helst møguligt at afturbøta regluliga, tí molin er bakverja, at minnilutin tekur undir við at fremja tað. Menn á staðnum hava álit á, at bati er í hesum grótkasti, og mælir minnilutin tí til at seta 4,5 mió. kr. av til hetta.

Ynski er eisini frammi um ávísa leingjan av molanum norðuri á Bergi, og kann minnilutin taka undir við, at útvegur er opin fyri hesum í játtanini.

Her kemur upp á tal annaðhvørt ein 10 metra leingjan stoypt á staðnum, ella leingjan við 15 × 15 metra kistu setta á 7-8 metra dýpi.

Uttan neyvari metan og útbjóðing letur tað seg ikki gera at áseta kostnaðin av hesum.

Byggiplássið er hitt torførasta, ið hugsast kann, og arbeiðið kann bert fremjast av allarkønastu og djarvastu kavarum, monnum, ið eru til reiðar at arbeiða við hvørjum amboði í tjóðri og við vanda fyri sjálvir at verða slongdir upp úr ella niður í »forskallingarnar«, tá neyðugt er at arbeiða tey stuttu tíðarbil, hesar kunnu standa. Tað er ikki eitthvørt byggifelag, ið hevur slíkar menn í arbeiði, og er prísurin tí sera óvissur, áðrenn tilboð fyriliggja.

Kistuna er helst lættari at seta, og serliga um meginparturin av grótkastinum verður útlagdur áðrenn.

Leysliga kann metast, at leingjan við 10 metrum á staðnum gerst ikki fyri minni enn 8 mió. kr. og setan av 15 metra kistu ikki fyri minni enn 10 mió. kr.

Minnilutin setir seg ikki føran fyri at geva endaligt tilmæli viðvíkjandi leingjanini, fyrr enn tilboð eru fingin til vega, men mælir til, at fyribils verða avsettar 10 mió. kr. til hetta arbeiðið.

Leingjanin hevur somu ávirkan sum grótkastið, at hon helst bøtir um innsiglingina á Pollin, men eftir køna manna metan ávirka hvørki grótkastið ella leingjanin kyrruviðurskiftini inni á sjálvari havnini. Har verða »fortoyningskreftirnar« tær somu og skiparenningin aftur og fram við bryggjusíðu hin sama.

Orsøkin til hetta er, at brotið, sum skapar ókyrru í innsiglingini, og

tann parturin, sum snarar beint um molaendan og eisini skapar ring innsiglingarviðurskifti, bert koma frá einum lítlum parti (3-5%) av teirri vatnmongd, sum ávirkar viðurskiftini í havnini.

Annar stórur partur av havalduni, sum setir inn í Skopunarfjørð, snarar orsakað av streym- og botnviðurskiftum norðan fyri boðan og longri norðan fyri molaendan suðuryvir, soleiðis at tær stóru vatnmongdirnar seta inn á Pollin og í havnina norðaneftir.

Serfrøðingarnir meta, at hesum bøtist bert fyri við einum pierstubba norðureftir uttanvert á Lítlaskeri og við viðkan av Pollinum og grótkasti fram við útnyrðings- og vestursiðuna av Pollinum.

Modellroyndir sýna, at pierur 40-50 metrar langur tekur 3/4 av ókyrruni inni í havnini burtur, samstundis sum hann veitir skipum lívd, meðan tey bíða uttan fyri portrið ella portursopið.

Við so longum pieri sum 50 metrar var yvirskjandi, at burtursprøingingin norður úr Pollinum var nærum so stór, sum hon tilætlað í projekti $V_5$, men hetta metir landsstýrið eins og undanfarna torført at útvega peningur til.

Tá samstundis menn, ið nýta skulu havnina, eru trekir við at fáa sett upp í skersendan, er helst skilagott at taka minni til. Hetta letur seg gera, tí her kemst aftur umaftur, hvat ikki er lætt viðvikjandi útspreinginini.

Minnilutin mælir tí til í fyrstu syftu bert at seta 25 metrar uppi uttanvert á Lítlaskeri, soleiðis at hesir eru framhald av ytra brimgarðinum um havnina. Tá útsprongt er, er siglingarviddin norð í Pollin úr hesum pierstubba 85-90 metrar og plássið dupult so stórt sum nú.

Millum henda nýggja »skersenda« og molan á Bergi eru á 75 metrar (70 metrar, um hann verður longdur 15 metrar) og 80 metrar inn til landssíðuna norðan fyri Oksaklett.

Mett er, at 25 metrar uttanvert skersendan kosta 10 mió. kr., men tá er eisini brimgarðurin longdur norður áraka verandi »skersenda« og uppfylt innanfyri.

Fyrimunurin við hesi loysn er, at rættiliga skjótt sæst, um pierur út frá Lítlaskeri bøtir tað, sum modellroyndirnar vístu, og menn kunnu tá taka støðu til at leingja 10-15 metrar afturat, sum serfrøðingarnir meta er betra loysnin. Slík leingjan saman við eina leingjan av molanum norðuri á Bergi 10-15 metrar er tá ósett eitt góðvert samspæl enn tað, landsstýrið hevur mælt til, og verður fortreytirnar fyri støðutøku betri, tá 24 metrar eru komnir uppi á Lítlaskeri.

Uppskot meirlutans ber onga havnaætlan í Skopum í sær. Sum ávist frammanfyri gerst eitt grótkast uttan fyri molan á Bergi og leingjan av honum ikki fyri minni enn 13-15 mió. kr. Tað vil siga, at málið skal

eina ferð enn fyri tingið, og hetta kann í fyrsta lagi verða á ólavsøku, tá verður ov seint at byrja í ár.

Vandi er hartil fyri, at menn fara at meta slíka bygging sum endaligu loysnina, tí nú hava vit jú »portrið«. Hendir tað, at bíðað verður eftir prógvi fyri, at portrið loysir ta uppgávu, sum pierstubbin úr Lítlaskeri skal loysa, so hava sandoyggjarfólk fingið eina loysn, tey ikki kunnu verða nøgd við, tí tá er ikki trygd fyri regluligari samferðslu við bilferju og trygg lega ikki útvegað trolarum og bátum, sum skulu landa til »Sólarris«.

Portrið hevur sínar stóru fyrimunir, men viðurskiftini í vetur hava víst, at trygga legu eiga skipini ikki, eins og tey eru í vanda fyri at verða innistongd. Hartil kemur, at slíkur dýrur »mekanikkur« krevur stórt viðlíkahald og útskifting tíðum. Slitið av stóru »páken ningunum« er stórt, og minkar effektiviteturin eisini samsvarandi skjótt við slitaguni.

Tí er avgerandi neyðugt, at nú ikki verður framdur leikur, sum ger, at vit inugu koma afturumaftur ov ofta. Vit hava lært, at tað at seta arbeiði í gongd á slíkum plássi kostar almikið, so skal samlaði kostnaðurin í Skopun ikki gerast úti við 150 mió. kr., er neyðugt at velja skilagott nú.

Hetta er torført við teim náttúruviðurskiftum, sum galda í Skopun, og trygd fyri 100% røttum vali fæst ikki, tað verður altíð ein ávís royn d inni í myndini, men kortini mælir minnilutin til at fremja niðanfyri uppsettu byggiætlan:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Ytri Pollur<br>Spreinging og dýping eftir projekti nakað størri enn $V_{1,5}$, útlegging av gróti fram við landi og til pierstøði, flutningur av avlopsgróti, vega- og brúgvagerðir, ljós og siglingarmerki ..... | 22,5 mió. kr. |
| 2. | Pierur úr Lítlaskeri (25 metrar uttanvert á skerinum), garður suður á brimgarðin, uppfylling sunnanfyri ..... | 10,0 — — |
| 3. | Grótkast uttanfyri molan norðuri á Bergi, 6.000 m³ av kjarnugróti og 7.000 m³ av verjugróti, vegagerð í Høvdahaga ..... | 4,5 — — |
| 4. | Hækkaðir einleikaprísir í mun til 1980-projektið ... | 2,5 — — |
| 5. | Møgulig leingjan av molanum norðuri á Bergi 10-15 metrar ..... | 10,0 — |
| 6. | Projektering, eftirlit og ókendar útreiðslur ..... | 5,5 — — |
| | Samanlagt | 55,0 mió. kr. |

Helst er eisini tørvur á heimild til 10% regulering til hvørja síðu, men kann støða takast til hetta, tá byggingin nærkast liðuggerð.

Mett hevur verið, at tað hevði verið skilagott at arbeitt fyri umleið 10 mió. kr. á Pollinum komandi fíggjarár. Hetta kann møguliga enn lata seg gera, um arbeiðið verður útboðið beinan vegin, soleiðis at byrjast kann í juni mánaði. Minnilutin mótmælir tí, at málið er drigið so langt út, at landsstýrið hevur loyvt sær at skerja upphæddina til hetta arbeiðið á fíggjarlógaruppskotinum úr 10 mió. kr. niður í 5 mió. kr.

Vegna tess, at helst bert ein partur av kjarnugrótinum til grótkastið uttan fyri molan norðuri á Bergi kemur úr Pollinum, meðan meginparturin av hesum og alt verjugrótið kemur úr Høvdahaganum, eru hesi arbeiði rættiliga óheft hvørt av øðrum, og kann tí byggjast fyri samanlagt 15 mió. kr. í komandi fíggjarári. Mælt verður tí til, at tær 5 mió. kr., avsettar eru til málið um ferjulegu í Kirkjubø — sum ikki er búgvið at fremja í ár — verða fluttar til gerð av grótkasti í Skopun.


Minnilutin setir soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at lata dýpa og víðka Ytra Poil í Skopun og har byggja pier o.a., leggja grótkast uttan fyri molan norðuri á Bergi og leingja hann.

§ 2. Heimilað verður eisini landsstýrinum landskassans vegna at læna upp til 55 mió. kr. í sambandi við fremjingina av teimum í § 1 nevndu arbeiðum.

Hjáløgd er tekning, ið sýnir broytta projektið, ið minnilutin mælir til at fremja.


LANDSBYGGIFELAGID

2. viðgerð 24. mars. Atkvøðugreiðsla á seinni fundi sama dag. Broytingaruppskot frá meiriluta í nevnd §§1-5 samtyktar við 32-0. Broytingaruppskot frá minniluta fall við 12-0.

3. viðgerð 7. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1811-6 Lóg nr. 44 frá 3. mai 1983.

---

# 85. Um kollektiva vanlukkutrygging fyri vanlukkur, ið henda undir grindarakstri, grindadrápi og upptøku av grind

Ár 1983, fríggjadagin 18. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um kollektiva vanlukkutrygging fyri vanlukkur, ið henda undir grindarakstri, grindadrápi og upptøku av grind.**

**§1.** Landsstýrið teknar eina kollektiva vanlukkutrygging, ið fevnir um vanlukkur, sum henda í sambandi við grindarakstur, grindadráp og upptøku av grind.

**lagtingslov om kollektiv ulykkesforsikring vedrørende skader, der sker under jagt efter grind, grindedrab og under oprydning af grind.**

**§1.** Landsstyret tegner en kollektiv ulykkesforsikring, der dækker ulykker, der sker i forbindelse med jagt efter grind, grindedrab og oprydning af grind.

§2. Landsstýrið ger og kunnger reglugerð um hesa trygging, hvussu vanlukka skal fráboðast, og hvørjar váttanir frá lækna og sýslumanni eru neyðugar.

§2. Landsstyret udfærdiger og bekendtgør reglement om denne forsikring, hvordan ulykkestilfælde skal anmeldes, og hvilke attester fra læge og sysselmand, der er påkrævet.

§3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Enn í dag er grind ein týðandi táttur í føroyska húsarhaldinum, eins og hon hevur verið gjøgnum øldir her á landi. Væl eru tíðirnar broyttar frá tí, at grind var ein avgjørdur lívsbjargandi lutur í føði føroyinga, og væl vilja tíðir framyvir áhaldandi broytast.

Men broyttu tíðirnar hava ávirkað, at luttøkan í grindarakstri og at drepa grind tíverri er vorðin minkandi millum manna, sjálvt um áhugin í dag ikki er minni enn fyrr.

Nú skulu menn leggja lønt arbeiði niður fyri at fara í grind ella fyri at taka grind upp og missa harvið dagløn — ja dagløntir — um farast skal av bygd eftir grind.

Tíverri stendst — av og á — mannskaði bæði undir rakstri ella í drápi, menn kunnu skera seg illa — ja, um óhappið er har, ella bátur brotnar — bæði bróta bein ella arm ella fáa annan likamsskaða. Eisini undir upptøku av grind kann slíkt koma fyri, t.d. tá tungir hvalir — oftast í myrkri — verða hivaðir upp til uppskeringar ella í bil til flutningar, kann krókur gleppa úr, tog ella wirur slitna og gera mannskaða.

Slíkur skaði er — um eg so má siga — fyri egna rokning, av tí at flestu menn eru ótryggjaðir, og kann sostatt óarbeiðsføri, hent í grind, verða dýrt í mistuin forvinningi.

Slík hóttan — risiko — økir ikki um áhugan fyri at fara í grind ella at vera við í upptøkuni.

Tí meti eg, at ein almenn landsumfatandi kollektiv vanlukkutrygging í hesum sambandi var uppá sítt pláss, havandi í huga, at enn í dag hevur ókeypis ella bílig grind munandi týdning í vanliga føroyska húsarhaldinum, og loyvi eg mær tí at seta hetta uppskot fram.

Lagtingstíðindi 1962 A 61

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, tann 18. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum skal landsstýrið tekna eina kollektiva vanlukkutrygging fyri persónsskaðar í grind.

Grindaskaði, sum ikki fevnir um persónsskaða, verður goldin við sølu av grindahvali. Í fleiri grindaøkjum verður eingin hvalur seldur fyri skaða, tí kommununrnar hava átikið sær at bera skaðan.

Nevndin heldur, at landsstýrið eigur at fáa Kommunufelagið at kanna, um ikki kommununrnar kunnu átaka sær hesa trygging, eins og flestu kommunur hava átikið sær at rinda fyri annan grindaskaða.

Vísandi til frammanfyristandandi setir nevndin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum saman við Kommunufelagnum og Tórshavnar Býráð at kanna, um kommununrnar kunnu átaka sær at tekna eina kollektiva persónstrygging fyri persónar, ið eru í grind.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið til samtyktar frá lóganevndini samtykt við 24-0 atkvøðum.

---

# 86. Gerð av ferjulegu í Kirkjubø

(Lm. 65/1981)

Ár 1983, fríggjadagin 18. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Pálli Vang, landsstýrismanni, tann 3. december 1981 og undir 1. viðgerð tann 10. december 1981 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Adolf V. Hansen Ove Mikkelsen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Í § 1 verður »18 mill.kr.« broytt til: »13 mill.kr.«.

I § 1 ændres »18 mill.kr.« til: »13 mill.kr.«

Á fíggjarløgtingslóg 1983/84 verða 4 mió. kr. avsettar til nevnda endamál.

Minnilutin (Atli Dam) fær fram:

Tvær reisur hevur tingið høggivið um bygging at ellisgubbyggjo í Kirkjubø. Fleiri skitsuprojekt eru gjørd, men er ongantið komið til bygging, so helst hevur málið ikki verið høgvið.

Hetta serliga tí at viðurskiftini í teirri havn, Kirkjubøur fremst skuldi hava samband við, ikki hava verið nóg góð, soleiðis at ferðamannaskip hevði legu har.

Fyriliggjandi skitsuprojekt er heldur ikki høgvið at fremja. Fyri tað fyrsta av somu grund sum omanfyri nevnt og fyri tað annað, tí nærri kanningar ikki eru gjørdar viðvíkjandi hesum projekti.

Tað tykist vera lítið høpi í ferjusambandi ímillum Kirkjubø

og Skopun, fyrr enn trygd er fingin fyri, at ferjan fær ligið í øðrum staðnum, hesa fáa vit ikki, fyrr enn vitað er, hvussu útbyggingin fer at roynast í Skopun, sum helst er havnin, skipið skal liggja í.

Sjálvsagt ber til, at skipið liggur í Tórshavn og siglir haðani morgun og kvøld, meðan tað mitt á degi røkir siglingina Kirkjubø-Skopun-Hest-Koltur, men tá er so neyðugt við øðrum fari til Nólsoyar, og kenst henda loysn ótullfíggjað.

Tá so hartil kemur, at landsverkfrøðingurin í fíggjarnevndini hevur latið ljóða, at projektið má kannast nærri og helst broytast, soleiðis at nakað verður sprongt innan fyri pierin úr Árnanesi, tí ov grunt er, at brimgangurin á innsiglingini helst verður ov stórur, og at møguliga má spreingjast inn í lendið sunnan vert Árnanes, er metingin um kostnaðin 18 mill.kr. so leys, at tað vildi verið burturvið at samtykt hana nú.

Minnilutin mælir tí til at senda uppskotið aftur til landsstýrið við áheitan um, at landsstýrið letur hetta kanna nærri og projekt gera, sum byggir á haldgóðar metingar -- og helst modelroyndir -- sum tryggja, at her ber til at hava reglutligt ferðasamband fleiri ferðir dagliga við rímiligari trygd fyri regularitetið.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Málið verður aftursent landsstýrinum vísandi til omanfyri standandi viðmerkingar.

2. viðgerð 24. mars. Atkvøðugreiðsla á seinri fundi sama dag. Broyting frá meiriluta í nevndini til §1 samtykt við 20-0. Uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 22-0, §2 við 21-0. Broytingaruppskot frá minniluta (Atli Dam) fall við 12-0.

3. viðgerð 7. apríl. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

Lóg nr. 43 frá 3. mai 1983

# 87. Broyting í tryggingarlógini

Ár 1983, fríggjadagin 18. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging.**

**§1.** Í §5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verður sett sum nýtt 2. punktum:

»Í øllum hesum málum hevur landsstýrið heimild at taka bindandi avgerðir, eisini heimild at gera reglugerðir.«

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om forsikringsvirksomhed.**

**§1.** I §5, stk. 2 i lagtingslov nr. 24 af 28. marts 1956 om forsikringsvirksomhed tilføjes som nyt 3. punktum:

»I alle disse spørgsmål har landsstyret bemyndigelse til at træffe bindende beslutninger, herunder hjemmel til at udstede vedtægter.«

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Eftir §6 í tryggingarlógini verður Tryggingarsambandið Føroyar sum tryggingarsamtak við fleiri undirtryggingardeildum, hvør deildin við sínari nevnd, fyrisitið av eini aðalnevnd við 5 limum og einum umboðsmannaráði. Í aðalnevndini eru 5 limir, 2 valdir av løgtinginum, 2 av landsstýrinum og 1 av umboðsráðnum. Til umboðsmannaráðið velur hvør undirdeildin 1 lim, í løtuni eru 6 deildir.

Í §5 í lógini er fyrisett, at tær nærru reglurnar fyri virkir og uppbygging tryggingarsamtaksins og deildirnar verða settar við reglugerðum, sum verða staðfestar av landsstýrinum.

Ósemja er millum landsstýrið og umboðsmannaráðið um orðingina

av reglugerðini fyri ráðið. Av tí, at landsstýrið skilir lógina soleiðis, at ein reglugerð skal vera fyri ráðið, men at tað ikki nóg greitt framgongur av lógartekstini, at landsstýrið, tá ósemja er, hevur heimild til at gera reglugerðina, er skotið upp at orða lógina soleiðis, at eingin ivi er um hesa heimild landsstýrisins. Síðani tilsvarandi ósemja kann taka seg upp, tá ið umræður reglugerðirnar ella viðtøkurnar fyri høvuðsdeild og undirdeildir, umfatar broytingin hesar við. Eisini er orðingin at skilja soleiðis, at í øllum málum, har umræður virkir og uppbygging samtaksins deildum og umboðsráðið, hevur landsstýrið eina generalla heimild at taka avgerðir.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 17. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 18. mars 1983 og við 1. viðgerð 23. í s.m. beint í lóganevndina.

Eftir §5, stk. 2, í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um tryggingarviðurskift verða tær nærru reglurnar fyri virki og uppbygging tryggingarsamtaksins og deildirnar ásettar við reglugerð, sum verða staðfestar av landsstýrinum.

Í sambandi við gerð av fundarskipan fyri umboðsráðið hjá Tryggingarsambandinum er ósemja komin upp millum landsstýrið og umboðsráðið um heimildina hjá partunum.

Umboðsráðið metir, at tað er tað, sum hevur heimildina at gera reglugerðir, sum landsstýrið hevur skyldu at staðfesta obroyttar.

Landsstýrið hevur broytt uppskot umboðsráðsins til fundarreglugerð fyri umboðsráðið soleiðis, at starvsfólk í samtakinum ella deildunum ikki kunnu vera limir í umboðsráðnum. Í lætuni eru tveir deildarstjórar limir í umboðsráðnum, og metir landsstýrið hetta ikki at vera heilagt. Landsstýrið hevur ásett tann reglugerð sum kunngerð nr. 3 frá 12. januar 1983. Umboðsráðið kann ikki góðkenna hesa reglugerð, og hevur umboðsráðið tí ikki virkað í hesum árinum við teirri fylgju, at t.d. eingi lán hava verið játtað í hesum árinum.

Nevndin hevur fingið upplýst, at umboðsráðið ikki ...ur arbeitt væl, og hevur eitt av høvuðsorsøkunum verið, at umboðum fyri tær einstøku deildirnar hava verið ónregd við fyrisitingina av §15 í samtyktunum fyri Tryggingarsambandið um, at ongar hvorjari deild at inngjalda 5 % av allari tryggingargjaldinum til samtakið, sum við

frádrátti av umsitingarútreiðslum samtaksins skulu fara í ein grunn at nýta sum trygd fyri skyldum hjá teimum einstøku deildunum í staðin fyri endurtrygging. Í nevnda grunni er eingin peningur, og er hann allur brúktur til umsiting og til at fíggja undirskotið av bilatryggingini við.

Nevndin heldur, at tað eigur at verða nærri kannað, hví §15 í viðtøkunum organtíð hevur virkað eftir síni upprunaligu ætlan, síðani samtakið varð sett á stovn. Verður mett, at grunnurin heldur ikki í framtíðini fær nakra upphædd, eigur støða at verða tikin til at broyta §15 í viðtøkunum.

Í lógini er tilskilað, at umboðsráðið verður valt av nevndunum í teimum einstøku deildunum, men er eingi tilskilað um, hvussu langt áramál valið er galdandi fyri. Eftir viðtøkunum er ein limur í umboðsráðnum frá triðja hvørt ár, og tá tað í løtuni eru 6 umboðsráðslimir, kemur hvør limur sostatt at sita í 18 ár. Nevndin heldur tað ikki vera hóskandi við einum so longum valskeiði.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Øssur Dam Jacobsen og Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum og setir fram fylgjandi

**Broytingaruppskot**

aftrat uppskoti landsstýrisins:

| | |
|---|---|
| §6, 2. stk. verður orðað soleiðis:<br>Í umboðsráðnum sita 7 limir, sum løgtingið velur fyri 4 ár.« | §6, stk. 2, affattes således:<br>»Repræsentantskabet består af 7 medlemmer, der vælges af lagtinget for 4 år.« |

Haraftrat setir sami meiriluti fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

I. Álagt verður landsstýrinum at broyta samtyktina (§5) fyri Tryggingarsamband Føroya soleiðis, at umboðsráðið verður valt av løgtinginum í staðin fyri sum nú av deildunum, og soleiðis, at valskeiðið verður 4 ár í staðin fyri sum nú upp til 18 ár.

II. Álagt verður landsstýrinum at kanna, hví § 15 í somu samtykt ikki kann virka eftir síni upprunaligu ætlan og um neyðugt broyta orðingina í hesi grein.

Minnilutin (Jona Henriksen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir tó til, at grein 6, 2. stk. verður orðað soleiðis:

Í umboðsráðnum sita 7 limir, nevndirnar í Tryggingarsamtakinum velja hvør sín lim (4 limir), og haraftrat velur Føroya Løgting 3 limir. Valskeiðið er 4 ár.

Haraftrat verður sett fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at broyta samtyktina (gr. 5) fyri Tryggingarsamband Føroya soleiðis, at umboðsráðið verður valt av nevndunum í Tryggingarsamtakinum og Føroya Løgtingi, og at valskeiðið verður 4 ár í staðin fyri sum nú upp til 18 ár.

17. mai løgdu Petur Reinert og Jona Henriksen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

§ 1 í uppskoti landsstýrisins gongur út.

**Viðmerkingar:**
Tá ið løgtingið eftir uppskoti meirilutans skal velja allar sjey limirnar í umboðsráðnum, má tað haldast vera órímiligt, soleiðis sum landsstýrið mælir til, at landsstýrið í øllum málum skal hava heimild til at taka bindandi reglugerðir, eisini heimild til at gera reglugerðir. Tað má vera nóg mikið, at landsstýrið eftir uppskotum hins løgtingsvalda umboðsráðs skal staðfesta reglugerðir, soleiðis sum lógin nú ljóðar.

18. mai løgdu Erlendur Patursson, Petur Reinert, Jona Henriksen og Tórálvur Mohr Olsen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í staðin fyri § 1, soleiðis sum hon varð samtykt við 2. viðgerð,

verður sett:

§5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verður orðað soleiðis:

| | |
|---|---|
| »Tær nærri reglurnar fyri virkir og uppbygging tryggingarsamtaksins og deildirnar verða settar við reglugerðum, sum verða staðfestar av landsstýrinum.« | »De nærmere regler for forsikringsforbundets og underafdelingernes virksomhed og organisation fastsættes ved vedtægter, der stadfæstes af landsstyret.« |

2. viðgerð 17. mai, atkvøðugreiðsla 18. mai. §1, nýtt 3. stk. samtykt við 25-0, §1 soleiðis broytt samtykt við 20-0, §2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Broytingaruppskot til §1 frá Jonu Henriksen fall við 7-0, og broytingaruppskot frá Jonu Henriksen og Petur Reinert fall við 13-0. Uppskotini til samtyktar I og II samtykt við ávikavist 25-0 og 28-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum. Broytingaruppskot til nýggja §1 fall við 13-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1410-3-15. Lóg nr. 61 frá 23. juni 1983

# 88. Skattalóg (Samtíðarskattur)

Ár 1983, hósdagin 24. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

*Sí skjal 14*

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 31. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Uppskot til samtíðarskattalóg varð lagt fyri tingið av landsstýrinum tann 24. mars 1983 og varð undir 1. viðgerð, sum fór fram 8. apríl í ár, beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini útvegað sær upplýsingar frá lands- og kommunuskattamyndugleikum o.ø., sum í dagliga yrki sínum arbeiða við skattamálum. Nevndin hevur fingið áheitanir um at gera ávísar broytingar í lógaruppskoti landsstýrisins, frá Tórshavnar Líkningarnevnd, Hests bygdarráð, sorinskrivaranum, Føroya Landfúta, Landsfelag Føroyinga í Útbúgving, Almannastovuni, Føroya Arbeiðsmannafelag, Føroya Fiskimannafelag og Ítróttarsambandi Føroya.

Undir 1. viðgerð av uppskoti landsstýrisins funnust tingmenn at føroyska málbrúkinum í lógaruppskotinum. Skattanevndin hevur tikið hesar atfinningar til eftirtektar og hevur biðið Jóhan Hendrik Winther Poulsen, málfrøðing, gera málsligar rættingar til lógaruppskotið og viðmerkingar tess. Tað rættaða eintakið av lógaruppskotinum varð lagt fram á tingi tann 16. í hesum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Ein meiriluti í nevndini (Eli Nolsøe, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja tað málsliga rættaða lógaruppskotið við hesum broytingum:

1) §1, nr. 3 verður orðað soleiðis:
»Hvør persónur, sum fær sær tilhald í Grønlandi minni enn 2 ár, íroknað frítíðarferðum o.t. Giftur persónur, sum hevur húski sítt í Føroyum, og hvørs tilhald í Grønlandi — bert slitið við frítíðarferðum o.t. — er í minsta lagi 2 ár, verður skattaður við helvtini av skattskyldugu inntøkuni í Føroyum, frádrigið helvtini av skattinum, hann hevur rindað í Grønlandi av somu inntøku. Innkrevjingarvaldið kann veita freist við skattgjaldingini í førum, tá tað má haldast vera sannað, at tilhaldið í Grønlandi fer at vara 2 ár ella longur.«

§1, nr. 3 affattes således:
»Enhver person, som tager ophold på Grønland mindre end 2 år, iberegnet ferier o.l. En gift person, der har sin husstand på Færøerne og hvis ophold på Grønland, uden anden afbrydelse end ferier o.l. varer i mindst 2 år, beskattes med halvdelen af den skattepligtige indtægt på Færøerne fradraget halvdelen af den skat, der er betalt på Grønland af samme indtægt. Opkrævningsmyndigheden kan indrømme henstand med betaling af skatten i tilfælde, hvor det må anses for godtgjort, at opholdet på Grønland vil vare 2 år eller mere.«

2) §3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Landsstýrið kann gera av, at persónur, sum verður skattaður smb. §1, 2) fær fult ella partvíst skattafrælsi, um so er, at inntøkan er fingin í sambandi við kirkjulig ella manngóð endamál. Áður enn avgerð er tikin, fær landsstýrið sær álit í málinum frá viðkomandi bygda(r)ráð.«

§3, stk. 2 affattes således:
»Skattepligten for de i §1, 2) nævnte personer, kan efter landsstyrets bestemmelse helt eller delvis bortfalde, såfremt indtægten er fremkommet i forbindelse med kirkelige eller humane formål. Forinden afgørelsen indhenter landsstyret en erklæring over sagen fra vedkommende kommunalbestyrelse.«

§3, stk. 2 verður §3, stk. 3.

§3, stk. 2 bliver §3, stk. 3.

**Viðmerkingar:**
Tað kemur fyri, at persónur, sum dvølir uttanlands í bráðfeingi, fær løn sína ásetta undir teimum fyritreytum, at hann ikki svarar inntøku-

skatt í hesum landi. Ásetanin er tí ætlað landsstýrinum at fyrisita á tann hátt, at viðkomandi fær somu nettoløn, sum persónur her á landi við sama starvi vildi fingið.

3) Í §4, 3. stk. verður »serstakliga« broytt til: »serstakt«.

4) Í §14, 6. stk. ganga orðini »útyvir virði í vanligum handli« út.

I §14, stk. 6 udgår »ud over aktivets værdi i handel og vandel«.

5) §14, 7. stk., 2. pkt. verður soljóðandi:
»Krevjast kann, at búgv, sum verða skift privat, skulu lata uppgerð inn.«

6) §16 verður orðað soleiðis:
»Virðisásetingin í uppgerðinum kann vera tað skattliga bókførda virðið ella annað rímiligt mett virði.«

§16 affattes således:
»Værdiansættelsen i opgørelsen kan gøres til den skattemæssigt bogførte værdi eller anden rimelig værdi.«

7) Í §17, 2. stk. gongur seinasta pkt. út.

I §17, stk. 2 udgår sidste pkt.

8) Í §21 verður sett sum nýtt 4. stk.:
»Nýstovnað partafeløg kunnu yvirtaka ognir frá verandi virki, um gomlu eigararnir verða lutfalsliga líka stórir partaeigarar til skattliga bókført virði, ella annað rímiligt virðismett virði.«

I §21 indsættes som nyt stk. 4:

»Nystiftede aktieselskaber kan overtage aktiver fra bestående virksomheder, hvis de tidligere ejere fortsætter med forholdsvis samme aktiekapital til de skattemæssigt bogførte værdier eller andre rimeligt vurderede værdier.«

**Viðmerkingar til nr. 6, 7 og 8** viðvíkjandi deyðsbúgvum og partafeløgum:

Í staðin fyri uppskotnu regluna um, at tá ið deyðsbúgv verða yvirtikin av arvingum, skal ein virðismeting fara fram, og harvið eisini

møgulig skatting av einum meirvirði, skjýtur nevndin upp, at arvingar, sum higartil kunnu yvirtaka búgvið fyri bókført virði.

Eisini eigur tað at verða soleiðis, at um persónur ella persónar gera eitt verandi virki til partafelag, skulu ognirnar sum higartil kunna yvirdragast til nýggja felagið til skattliga bókført virði ella annað hægri rímiligt virði, tó hægst virði í vanligum handli. Tað er ein fyritreyt, at eigararnir eru lutfalsliga teir somu, burtursæð frá at tað eigur at verða gjørligt at uppfylla treytirnar í partafelagslógini.

Tá ið arvingarnir selja virkið til aðrar persónar, ella partafelagið selur ognir sínar víðari, verður skattingin at fara fram eftir teim nýggju reglunum fyri skatting av avskrivaðum ognum.

| | |
|---|---|
| 9) §29, nr. 13 verður orðað soleiðis:<br>»Aldursviðbót eftir §10, persónlig viðbót eftir §14 og hjálpar-, røktar- og avlamisviðbót eftir §16 í lóg nr. 58 frá 15. mars 1967 um fólkapensjón við seinni broytingum, avlamisgjald eftir §4, 2. stk., hjálpar- og røktarviðbót eftir §11, persónlig viðbót eftir §15, avlamisveiting, hjálpar- og røktarviðbót hartil eftir §16, veitingar eftir §§31 og 32 og avlamisviðbót og hjálparviðbót eftir §45 í lóg nr. 44 frá 15. mars 1967 um avlamispensjón v.m. við seinni broytingum og veitingar eftir §§15, 16, 17 og 18 og persónligar viðbøtur eftir §9, §13 og §29 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 um almenna forsorg við seinni broytingum.« | §29, nr. 13 bliver sålydende:<br>»Alderstillæg efter §10, personlige tillæg efter §14 og bistands-, pleje- og invaliditetstillæg efter §16 i lov nr. 58 af 15. marts 1967 om folkepension med senere ændringer, invaliditetsbeløb efter §4, stk. 2, bistands- og plejetillæg efter §11, personligt tillæg efter §15, invaliditetsydelse, bistands- og plejetillæg hertil efter §16, ydelser efter §§31 og 32 og invaliditetstillæg og bistandstillæg efter §45 i lov nr. 55 af 15. marts 1967 om invalidepension m.v. med senere ændringer samt ydelser i henhold til §15, 16, 17 og 18 og personlige tillæg efter §9, §13 og §29 i lov nr. 56 af 15. marts 1967 om offentlig forsorg med senere ændringer.« |

**Viðmerkingar:**

Hetta samsvarar fult út við tær greinir, sum eru nevndar í skattalógar-

uppskoti landsstýrisins, undantikið at ein komandi §18 í forsorgarlógini er tikin við. Henda samsvarar §16 í galdandi forsorgarlóg, sum verður nýtt sera sjáldan og helst av misgáum ikki er tikin við í 1963. Greinin fevnir um somu viðurskifti sum §31 og §32 í avlamispensjónslógini.

| | |
|---|---|
| 10) Í §31 verður b) soljóðandi: »Gjald til yrkisfeløg fyri vinnurekandi.« b), c) og d) verður broytt til c), d) og e). | I §31 bliver b) sålydende: »kontingent til erhvervsforeninger for erhvervsdrivende.« b), c) og d) ændres til c), d) og e). |
| 11) Í §33 nr. 6 verður »4« broytt til: »3«. | I §33 nr. 6 bliver »fire« ændret til: »3«. |

**Viðmerkingar:**
Meirilutin ynskir onga broyting av galdandi skattalóg á hesum øki.

| | |
|---|---|
| 12) Í §33 nr. 9 verður strikað: »uttanfyri hjúnalag«. | I §33 nr. 9 udgår: »udenfor ægteskab«. |

**Viðmerking:**
»Uttanfyri hjúnalag« er komið við av misgáum.

13) Í §33 nr. 9 verða orðini: »skild til borð og song« broytt til: »sundurlisin«.

**Viðmerking:**
Broytingin er gjørd, tá »sundurlisin« verður nýtt um sama fyribrigdi alla aðra staðni í lógini.

| | |
|---|---|
| 14) Í §42, 2. pkt. verður strikað: »uttan tá tað má haldast, at hann fer at halda til í fyrrnevndu kommunu alt inntøkuárið.« | I §42, 2. pkt. udgår: »medmindre opholdet i førstnævnte kommune må forudsættes at ville udstrække sig over hele indkomståret.« |

**Viðmerking:**
Broytingin er bert ætlað landsstýrismonnum.

15) §46, stk. 3 verður orðað soleiðis:

»Bygda(r)ráðini kunnu avgera, at í útroknaða kommunuskattinum kann verða játtaður ein barnafrádráttur. Upphæddin skal vera viðtikin av bygda(r)ráðnum áðrenn 1. oktober sum galdandi fyri komandi inntøkuár.«

§46, stk. 3 affattes således:

»Kommunalbestyrelserne kan afgøre, at der i den udregnede kommuneskat kan indrømmes et børnefradrag. Beløbet skal være vedtaget af kommunalbestyrelsen inden 1. oktober som gældende for næste indtægtsår.«

**Viðmerking:**
Meirilutin metir, at bygda(r)ráð á sama hátt sum at áseta kommunuskattaprosent eisini eigur at áseta upphæddina av barnafrádrátti.

16) Í danska tekstinum verður §49, stk. 5 soljóðandi:

»Selskaber m.v. bliver skattepligtige til erhvervskommunen, når den i §48, stk. 2 nævnte virksomhed påbegyndes, og skattepligten ophører, når nævnte virksomhed ophører.«

**Viðmerking:**
Av misgáum er komin inn donsk tekst, sum ikki samsvarar føroysku.

17) I §75, stk. 1 indsættes efter »restskat«: »m.v.«.

**Viðmerking:**
»m.v.« er helst av misgáum dottið úr danska tekstinum.

18) Í §84, stk. 1 verður strikað: »5« og í staðin sett: »7«,

I §84, stk. 1 udgår »5«, og i stedet sættes: »7«.

19) Í §84, stk. 2 verður í 1. pkt, og 3. pkt. »fyri alt valskeiðið« strikað.

I §84, stk. 2, 1. pkt. udgår »og har virkning for kommunalbestyrelsens funk-

tionsperiode«, og i 3. pkt. udgår »for hele valgperioden«.

**Viðmerking:**
Mett verður, at rættast er at fylgja reglunum í kommunulógini á hesum øki, og at nýggjar reglur um hetta eiga at ásetast í kommunulógini.

| | |
|---|---|
| 20) Í § 133 verður seinasta pkt. strikað. | I § 133 udgår sidste pkt. |
| 21) Í § 137 verður seinasta pkt. strikað. | I § 137 udgår sidste pkt. |
| 22) Í § 143 gongur 4. stk. út. | I § 143 udgår stk. 4. |

**Viðmerkingar til nr. 19, 20 og 21:**
Skattanevndin hevur spurt seg fyri hjá sorinskrivaranum, og metir hann, at nevndu ásetanir fara at gera viðgerðina hjá skiftirættinum ógvuliga trupla. Harafturat metir meirilutin í skattanevndini, at hesar ásetanir ikki hoyra heima í skattalógini, men í skiftilógini, »Lov nr. 155 af 30. november 1874«.

Annars hevur meirilutin hesar viðmerkingar:

*Til § 3, stk. 2:*

§ 3, stk. 2 eigur at verða umsitin soleiðis av landsstýrinum, at ítróttafeløg o.t., sum higartil hava verið skattafræls, hava skattafrælsi eftir hesi reglu.

*Til § 26, stk. 3:*

Her verður ásett, at høvuðsreglan fyri virðisásetanini av vørum á goymslu er keypsvirðið ella framleiðsluvirðið uppgerðardagin. Tó kann virðisásetingin verða veruligi keypsprísurin ella framleiðsluprísurin, um hesin er lægri.

T.v.s. at lógin staðfestir tað sokallaða »laveste værdis princip«.

Eisini verður vanligt, at virðisásetingin verður lækkað fyri ókurrantleika. Ein treyt fyri hesum er, at vøruuppgerðin er nágreinilig, og grundgevingin er haldgóð.

Av stórum týdningi er, at skattauppgerðin og roknskaparuppgerðin

eftir vanligum roknskaparsiði eru so líkar sum møguligt.

Landsstýrið (fíggjarmálaráðharrin) eigur tí at lata gera reglugerð, sum ásetir gjølligar reglur fyri uppgerð av vøruǵoymslu, soleiðis at øll, sum hava roknskaparskyldu, fyri framtíðina vita, hvat ið er galdandi praksis. Fyri rættartryggleikan er tað ótolandi, um ein higartil brúkt praksis fyrisitingarliga verður broytt við afturvirkandi gildi.

Tað sama er galdandi fyri møguliga avskriving av debitorum.

Tá fíggjarligir trupulleikar gera seg galdandi, er serliga átrokandi, at roknskaparreglur, sum krevja ávísa avskriving av debitortilgóðahavandi, ikki víkja ov nógv frá skattligum reglum. Tí eigur landsstýrið eisini her at gera meira gjølligar og rímiligar reglur.

Í heila tikið vil nevndin mæla til, at skipað verður fyri, at reglugerðir verða gjørdar, so ymiskir ivaspurningar verða greiddir, og rættartrygdin verður betri.

*Til §29, nr. 12:*

Ásetanin umfatar eisini tann sømdarpening, sum latin verður fyri skaldskap og list á fíggjarløgtingslógini.

*Til kap. 14:*

Nevndin hevur spurt seg fyri hjá landfútanum, og metir hann, at hetta kapittul ikki er í tráð við nýggjari lógartekniskar tankar. Meirilutin í nevndini kann taka undir við hesi uppfatan, men mælir kortini til at samtykkja kapittul 14 so sum skotið upp.

Samstundis setir meirilutin fram soljóðandi

## I.
## Uppskot til samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at leggja fram broytingaruppskot til kapiitul 14 í samtíðarskattalógaruppskotinum um revsiásetanir í ólavsøkutingsetuni 1983.

Viðvíkjandi fólki undir útbúgving, sum í útbúgvingartíðini hava fingið útsettan skatt, verður álagt landsstýrinum at gera lagaligar gjaldsskipanir við hesi fólk, alt eftir fíggjarligu umstøðunum hjá teimum einstøku.

Í sambandi við skifti til samtíðarskatt kemur landsstýrið við uppskoti til reglur um skatting fyri árini 1982 og 1983 av serligum inntøkum og útreiðslum.

Hetta snýr seg t.d. um afturvunnar avskrivingar (inntøkur) og veðhaldstap (útreiðslur). Skatturin verður ásettur til 50%.

Haraftrat hevur nevndin hesi uppskot til samtyktar:

**II.**

**Uppskot til samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið lógaruppskot, sum miðar ímóti, at hesar broytingar í skattalógini koma í gildi 1. januar 1985:

Allar samsýningar til einstaklingar fyri arbeiði og veitingar, sum eru undir B-skatti, skulu gjaldast um góðkent avrokningarstað, sum eftirlieldur B-skattin. Her er hugsað umt.d. samsýning fyri bønararbeiði og veitingar, so sum húsaleiga. Tann, ið ikki avroknar um góðkent avrokningarstað, stendur til svars fyri, at B-skatturin av gjøldunum verður goldin.

**III.**

**Uppskot til samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum til ólavsøkutingsetuna at koma við lógaruppskoti, sum miðar ímóti hesum endamáli:

1) at avskrivaðar ognir við sølu verða skattaðar av søluvirðinum sum grundarlag.
2) at søluvinningur kann nýtast til útvegan av bæði skipum, rakstrargøgnum og bygningum til vinnulig endamál.
3) at møguleiki verður at halda ognir uttanfyri avskrivingar og harvið søluskatting.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen) førir fram:

Hóast bæði javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin vilja fremja kelduskatt og hava virkað fyri hesum í seinasta landstýri og sostatt kundu havt orsøk til at fegnast, nú aðrir flokkar eisini taka undir við hugsanini um eina kelduskattaskipan, so kann minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) ikki taka undir við tí mannagongd, sum sitandi landsstýri og samgonga hava nýtt

og framhaldandi ætla at nýta í sambandi við umleggingina til samtíðisskatt.

Í fyrsta lagi kann minnilutin ikki taka undir við tí innkrevjingarhátti, sum verður nýttur í sambandi við skattin fyri skattaárið 1983/84, men vilja umboðini fyri javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin átala ta skattainnkrevjing, sum landsstýrið og samgongan fremja í hesum ári. Í hesum sambandi vil minnilutin vísa á, at í januar, februar og mars 1983 hava skattgjaldarar goldið 30 pst. av álíkningini fyri skattaárið 1982/83. Við tað, at vit í tíðarskeiðinum frá mai til november í ár skulu gjalda 75 pst. av álíkningini fyri 1983/84, koma vit í 1983 at gjalda 30 pst. + 75 pst. ella 105 pst. í mun til árini framman undan.

Við einum dømi vil minnilutin vísa, hvat kemur at henda skattgjaldara, um samtíðisskatturin ikki kemur í gildi 1. januar 1984, og hvat hinvegin kemur at henda, um samtíðisskatturin kemur í gildi sum ætlað. Sum dømi taka vit ein skattgjaldara, hvørs álíkning er 60.600 kr. Í 1983 skal hesin gjalda 75 pst. av álíkningini ella 45.450 kr. Hetta svarar til sjey gjøld á 6.493 kr. Kemur samtíðisskatturin ikki í gildi 1. januar 1984, fær viðkomandi eina ávísa kompensatión við tað, at hvørt av teimum trimum gjøldunum, sum falla til gjaldingar í januar, februar og mars 1984 bert eru uppá 4.850 kr. ella 1.643 kr. minni enn sjey tey fyrstu. Kemur samtíðisskatturin í gildi sum ætlað, fær skattgjaldarin ikki hesa kompensatión. Viðkomandi skal tá frá 1. januar 1984 gjalda skatt av inntøkuni so hvørt.

Eitt annað dømi er fólkapensionisturin. Í skattaárinum 1979/80 hevði ein einsamallur fólkapensionistur eina samlaða skattaupphædd uppá 64 kr. Í 1983 skal sami pensionistur gjalda 377 kr. um mánaðan. Í ár hevur ein einsamallur fólkapensionistur 3.500 kr. í skatti. Í fjør hevði hann 1.600 kr. Hjá lijúnum, sum fáa fólkapensjón, er støðan tann, at tey í ár hava 7.750 kr. í skatti, meðan tey í fjør høvdu 4.550 kr. Tá nú 75 pst. av álíkningini skulu gjaldast í 1983, so fremur hetta ein rættuliga stóran niðurskurð í gjaldførinum hjá tí einstaka. Umboðini fyri javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin ásanna, at politikkurin hjá borgarligu samgonguni í stuttum hevur verið tann, at vanligi føroyingurin skal bera munandi større part av samfelagsbyrðuni. Hetta kom fyrstu ferð til sjóndar við inntøkulógunum á heysti 1981. Í dag kosta hesar føroyingum 60-70 mió.kr. árliga. Hesi seinastu tvey árini er reallønin minkað við umleið 30 pst. Á tingi liggur uppskot frá landstýrinum, sum hevur til endamáls at broyta reglurnar um kredittkeyp, soleiðis at útgjaldingin verður

45 pst. Hetta kemur at gera tað heilt ógjørligt hjá vanligu lønarbólkunum at útvega sær ella at endurnýggja vanligar húsarhaldslutir. Oman á alt hetta kom so skattarokningin fyri 1983/84. Her skulu fólk so gjalda eitt hálvt gjald eyka í 1983. Minnilutin kann sum sagt ikki taka undir við hesum innkrevjingarhátti og setur tí fram soljóðandi

**A.**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landstýrinum verður álagt beinan vegin at senda øllum skattgjaldarum nýggj skattainngjaldingarkort, har skatturin fyri skattaárið 1983/84 verður goldin við 7/10 í 1983, og um samtíðarskatturin ikki kemur í gildi, so við 3/10 í 1984.

Í øðrum lagi kunnu umboðini fyri javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin ikki vera við til at fremja eina kelduskattaskipan uttan at vita, hvussu skattastigin, persónsfrádrátturin og barnafrádrátturin koma at síggja út. Við óbroyttum skattastiga og óbroyttum persónsfrádrátti vil ein umlegging av skattaskipanini føra til eitt nakað stórri skattatrýst. Longu nú bera lág- og miðalinntøkurnar nakað størri skatt enn fyri fimm árum síðan. Munurin á skattauppháddini hjá pensionistum frá einum ári til annað, tann er lystur frammanfyri, talar fyri seg. Orsøkin til hað vaksandi skattatrýstið á lág- og miðalinntøkurnar er, at hvørki skattastigin ella persónsfrádrátturin eru javnaðir við prisvøksturin annars tey árini. Hóast landsstýrið nú hevur boðað frá, at hað í hesum kemur við uppskoti um nýggjan skattastiga, um persónsfrádrátt og barnafrádrátt, so heldur minnilutin, at skattastigin, persónsfrádrátturin og barnafrádrátturin eru av so stórum tvaningi í hesum samanhangi, at hað als ikki hevur til at tosa um eina umlegging av skattaskipanini, fyrr enn at hava samanmett um, um komandi skattastiga og um persónsfrádrátt og barnafrádrátt, sipa tað at tosa um komandi skattalógir og um eina umlegging av skattaskipanini.

Í triðja lagi kunnu umboðini fyri javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin ikki taka undir við [illegible] landsstýrið og samgongan hava valt, og sum lógi[illegible] dataviðgerðina av skattaskránni um leið, eftir verður tað vánaligt samfelagsuppgáva [illegible] javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin [illegible] Her er eisini talan um eina [illegible]

og tað heldur minnilutin vera sera óheppið. Minnilutin vil vera við til at fremja skipanir, ið virka, og sum tryggja tað persónliga frælsið og trygdina hjá tí einstaka borgaranum, og her kann minnilutin vísa til álitið frá Informatiónsbólkinum sum eitt alternativ til ta EDV-loysn, ið landsstýrið og samgongan hava valt. Niðurstøðan hjá Informatiónsbólkinum, sum gav landsstýrinum frágreiðing við tilmælum í februar 1979, var, at tað almenna stigvíst byggir upp sína egnu EDV-skipan, har hvørt sær einans hýsir teim uplýsingum, ið tørvur er á fyri at loysa eina ávísa almenna uppgávu, eitt nú innkrevjing av skatti. Minnilutin kann annars vísa til tað, sum umboð fyri javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin førdu fram undir umrøðuni av løgtingsmáli nr. 42 og løgtingsmáli nr. 88 og til tað, sum umboðini fyri flokkarnar førdu fram í minnilutaálitum sínum í løgtingsmáli nr. 42.

Í fjórða lagi kunnu umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin ikki taka undir við, at ein umlegging av skattaskipanini verður skundað igjøgnum møguliga við tí úrsliti, at tann nýggja skipanin ikki kemur at virka. Í hesum sambandi kann minnilutin vísa á, at í Danmark varð kelduskattalógin samtykt við ársbyrjan í 1967, og tá var sjálvandi eitt ávíst fyrireikingararbeiði gjørt í sambandi við lógarsmíðið, men hóast hetta so lótu danir trý ár ganga frá tí, at lógin varð samtykt, til hon varð sett í verk. Hetta hendi 1. januar 1970. Úrslitið varð sannur ruðuleiki á skattaøkinum í Danmark tey fyrstu árini. Seinni søgdu serfrøðingar hjá danska skattavaldinum, at keiduskattalógin varð sett í verk tvey ár ov skjótt, og teir sostatt skuldu havt nýtt fimm ár til viðari fyrireiking frá tí, at kelduskattalógin varð samtykt.

Minnilutin leggur stóran dent á, at vit fáa eina vaktvirkandi skattaskipan, og leggur minni dent á, um ein nýggj skattaskipan kemur gildi eitt ár fyrr ella seinni. Umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin meta tó, at ein tryggj skattaskipan í fyrsta lagi kemur í gildi 1. januar 1985. Hervið fáa landsstyrið og skattaumsitingin hevi til at arbeiða viðari við málinum. M.a. eigur tað almenna í hesum sambandi at byggja upp sína egnu EDV-skipan. Tísin eiga vit at fremdarkovra eina nýggja innkrevjingarskipan (samtíðarskatt) parallelt við galdandi skipan í nakrar mánaðir, so hendan dátt kann vísa seg at vera møguligt at fremja tey veiku tíðina í eini nýggjari innkrevjingarskipan, sí

styrkt tey. Út frá hesum setur minnilutin fram soljóðandi

**B.**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Landsstýrinum verður álagt at virka fyri, at ein nýggj skattaskipan (samtíðarskattur) kemur í gildi, tó í fyrsta lagi 1. januar 1985.
2. Landsstýrinum verður álagt at byggja upp eina almenna EDV-skipan, sum kann takast í nýtslu samstundis við, at nýggja skattaskipanin verður sett í verk.

Fyri at bøta um tey verstu brekini í galdandi skattalóg, setir minnilutin fram

**C.**

**Uppskot**
**til**

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt** | **lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.** |
| **§1.** Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar: | §1 I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer: |
| 1) Í gr. 26, 1. stk. 1. punktum verður »1200 kr.« broytt til »1800 kr.« | 1) I §26, stk. 1, 1. pkt. ændres »1.200 kr.« til »1.800 kr.«. |
| 2) Gr. 26, 3. og 4. stk. verða orðað soleiðis:<br>»3. stk. Fyri hvønn persón verður persónsfrádrátturin í skattinum kr. 6.000,-. Har bert annar hjúnafelagin hevur skattaskylduga inntøku, verður persónsfrádrátturin kr. 12.000,-.«<br>»4. stk. Fyri hvønn persón yvir 67 ár, og persónar, sum fáa av- | 2) §26, stk. 3 og 4 bliver sålydende:<br>»Stk. 3. For enhver person bliver personfradraget i skatten 6.000 kr. I tilfælde, hvor den ene ægtefælle har skattepligtig indkomst bliver personfradraget kr. 12.000.-.«<br>»Stk. 4. For enhver person over 67 år, og personer, som modta- |

lamis-, einkju- ella fólkapensión, verður persónsfrádrátturin kr. 10.500,-, tá skattskylduga inntøkan ikki er yvir 50.000 kr. Har inntøkan er hægri, verður frádrátturin lækkaður við 1% av muninum millum 50.000 kr. og inntøkuna, tó ongantíð niður um tann í 3. stk. galdandi frádrátt.«

ger invalide-, enke eller folkepension, bliver personfradraget kr. 10.500,-, når den skattepligtige indtægt ikke er over kr. 50.000,-. I tilfælde, hvor indtægten er højere, bliver fradraget formindsket 1% af forskellen mellem kr. 50.000,- og indtægten, dog aldrig under det i stk. 3 gældende fradrag.

3) Í gr. 26 kemur sum nýtt 6. stk.: »Frá og við 1. oktober 1984 verður persónsfrádrátturin prístalsviðgjørdur við prístalinum pr. 1. januar 1983 sett til 100«

3) I § 26 indsættes som nyt stk. 6. » Fra og med 1. oktober 1984 bliver personfradraget pristalsreguleret med pristallet pr. 1. januar 1983 sat til 100.«

§2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

§2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1983/84.

**Viðmerkingar:**

Gongdin tey seinastu árini hevur gjørt tað munandi dýrari og tyngri at liva hjá fólki við lágum inntøkum. Serliga eru tað barnarík húski og pensionistar, sum eru hart rakt. Uppskotið frá minnilutanum inniheldur eina hækking í barnafrádráttinum í landsskattinum uppá 600 kr. fyri hvørt barn. Skotið verður upp at hækka barnafrádráttin úr 1200 kr. upp í 1800 kr.

Broytingarnar sum vórðu gjørdar í skattalógini í 1978, førdu m.a. við sær, at fólkapensionistar ikki fingu skatt. Men við tað at pensiónirnar eru hækkaðar við pristalinum, er støðan broytt hesi árini við tí úrsliti, at fólkapensionistar nú aftur fáa skatt. Her verður skotið upp at hækka persónsfrádráttin hjá pensionistum so munandi, at hesir aftur sleppa undan skatti.

Eisini verður skotið upp at hækka persónsfrádráttin hjá øðrum skattgjaldarum við 50 pst., at avtaka stigvísu minkingina av persónsfrádráttinum í mun til inntøkuna, og at allir persónsfrádráttirnir verða prístalsviðgjørdir.

Minnilutin hugsar sær, at hesar broytingar fáa gildi fyri hetta skattaárið, um so verður, at ein meiriluti tekur undir við uppskoti minnilutans á síðu 10, har skotið verður upp at áleggja landsstýrinum beinan vegin at senda øllum skattgjaldarum nýggj inngjaldingarkort,

har skatturin fyri skattaárið 1983/84 verður goldin við 7/10 í 1983 og — um samtíðarskatturin ikki kemur í gildi 1. januar 1984 — so við 3/10 í 1984.

Minnilutin (Hilmar Kass og Eli Nolsøe) setir fram hetta

**Uppskot**

Í § 54 verður sett sum nýtt 2. stk.:

»Um samlaði inntøkuskatturin til landskassa og kommunukassa fer upp um 50% av skattskyldugu inntøkuni, verður tann ov nógv álíknaði inntøkuskatturin lækkaður lutfalsliga til landskassa og kommunukassa.«

»Overstiger den samlede indkomstskat til landskasse og kommunekasse 50% af den skattepligtige indtægt, skal landsskatten og kommuneskatten nedsættes forholdsmæssigt med den overskydende del.«

Minnilutin (Jógvan Sundstein) setir fram soljóðandi

**Uppskot**

Í § 54 verður sett sum nýtt 2. stk.:

»Um samlaði inntøkuskatturin áðrenn rentufrádrátt til landskassa og kommunukassa fer upp um 50% av skattskyldugu inntøkuni, verður tann ov nógv álíknaði inntøkuskatturin lækkaður lutfalsliga til landskassa og kommunukassa.«

»Overstiger den samlede indkomstskat før rentefradrag til landskasse og kommunekasse 50% af den skattepligtige indtægt, skal landsskatten nedsættes forholdsmæssigt med den overskydende del.«

Uppískoyti til álit í løgtingsmáli nr. 88/1982: Skattalóg (Samtíðarskattur).

Av misgáum varð hetta ikki tikið við í upprunaálitinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) viðmerking:

**Viðv. 1. grein 11.-13. stk.**
Eftir hesum greinum verða lutafeløg, sum higartil ikki hava goldið skatt, gjørd skattskyldug. Tað snýr seg um keypssamtøkur, fiskasølur, keypsfeløg o.l.

Minnilutin skal viðmerkja, at eftir hansara uppfatan hevði verið betri at varðveitt galdandi reglur, eftir hvørjum hesi feløg, sum bert skifta millum limir, og limirnir ábyrgjast fyri skuld felagsins, eru skattafrí.

Ávirkanin av nýggju reglunum t.d. viðvíkjandi Fiskasøluni vil bert vera tann, at fíggjarstøða felagsins viknar, fíggingarmøguleikarnir av goymsluvørum hjá limunum versna, og fiskaprísirnir lækka.

2. viðgerð 24. mars. Framhaldandi 2. viðgerð 1. juni, atkvøðugreiðsla á seinni fundi sama dag. Uppskot til samtyktar A fall við 15 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Asved Djurhuus, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Ernst Hansen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Broytingaruppskot frá minniluta í skattanevndini fall við 15-0. Uppskot til samtyktar B fall við 14-0. Uppskot frá meiriluta í nevndini pkt. 1 samtykt við 19-0, pkt. 2 samtykt við 17-0, pkt. 3 samtykt við 17-0, pkt. 4 samtykt við 17-0, pkt. 5 samtykt við 17-0, pkt. 6 samtykt við 18-0, pkt. 7 samtykt við 17-0, pkt. 8 samtykt við 18-0, pkt. 10 samtykt við 17-0, pkt. 14 samtykt við 17-0, pkt. 15 samtykt við 19-0, pkt. 16 samtykt við 17-0, pkt. 17 samtykt við 17-0, pkt. 18 samtykt við 17-0, pkt. 19 samtykt við 17-0, pkt. 20 samtykt við 17-0. Minnilutauppskot frá Jógvani Sundstein fall við 5-0. Minnilutauppskot frá Hilmar Kass og Eli Nolsøe samtykt við 19-0.

Uppskot til samtyktar I samtykt við 17-0, II samtykt við 20-0, III samtykt við 19-0. Viðmerkingarnar samtyktar við 26-0, §§ 1-161 samtyktar við 17-0 og at fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt við 17-0.

Atli Dam, løgtingsmaður, legði 1. juni 1983 fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
*til løgtingsmál nr. 88/1982 Skattalóg (Samtíðarskattur)*

Í §42 verður sett inn sum nýtt stk. 2:

»Løgtingsmaður, sum hevur tilhald uttan fyri valdømi sítt, men samstundis hevur tilhald í eini av kommununum í valdøminum, kann verða settur í skatt av løgtingsinntøku síni í hesi kommunu. Tó skal skatturin, hesin samanlagt verður settur í í báðum tilhaldskommununum av løgtings- og aðrari inntøku, ikki verða minni, enn um skattað varð bert í tilhaldskommununi uttan fyri valdømið.«

1 § 42 indsættes som ny stk. 2.:

»Lagtingsmand, der opholder sig udenfor sin valgkreds, men samtidig har ophold i en af kommunerne i valgkredsen, kan ansættes i skat af lagtingsindtægten i denne kommune. Dog skal skatten, som denne sammenlagt bliver anset til i begge opholdskommuner af lagtings- og anden indtægt, ikke være mindre, end hvis der kun skete beskatning i opholdskommunen udenfor valgkredsen.«

**Viðmerkingar:**
Løgtingsmaður hevur ofta slíkt tilknýti til ávísa kommunu í valdømi sínum, at rímiligt var, at hann — hóast hann av løgtingsstarvinum óviðkomandi grundum býr uttan fyri valdømi sítt — varð skattaður í hesi kommununi. Heldur ikki er ókent, at tilknýtið hevur týdning í øllum metingum viðvíkjandi uppstillingunum úti í valdømunum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Loyvi at frávíkja tíðarfreistini varð givið. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-0. Broytingaruppskotið frá Atla Dam fall við 16-0.

F.L.j.nr. 430-12-35-4 Lóg nr. 86 frá 1. sept. 1983.

# 89. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1983, mikudagin 23. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í gr. 26, 1. stk. 1. punktum verður »1200 kr.« broytt til »1500 kr.«

2) Í gr. 26, 4. stk. verður »kr. 6.500,00« broytt til »kr. 10.200,00« og »kr. 3.700,00« broytt til »kr. 7.400,00«.

3) Í gr. 26 kemur sum nýtt 6. stk.: »Frá og við 1. oktober 1983 verður persónsfrádrátturin prístalsviðgjørdur við prístalinum pr. 1. oktober 1982 sett til 100.«

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.**

**§1.** I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1) I §26, stk. 1, 1. punktum ændres »1.200 kr.« til »1.500 kr.«

2) I §26, stk. 4 ændres »kr. 6.500,00« til »kr. 10.200,00« og »kr. 3.700,00« til »kr. 7.400,00«.

3) I §26 tilføjes som nyt stk. 6: »Fra og med 1. oktober 1983 skal personsfradraget pristalsreguleres med pristallet pr. 1. oktober sat til 100.«

§2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

§2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1983/84.

**Viðmerkingar:**

Gongdin tey seinastu tvey til trý árini hevur gjørt tað munandi dýrari og tyngri at liva hjá fólki við lágum inntøkum. Serliga eru tað barnarík húski og pensionistar, sum eru hart rakt.

Meðan vit í sjeytiárunum høvdu ein javnan realløn arvøkstur, so hevur talan verið um eitt rættiliga stórt fall í realløninni hesi seinastu tvey árini. Løntakarafelagini hava víst á, at varð realløn in í 1970 sett ájavnt við 100, so var hon í 1979 komin upp á 125, meðan hon 1. januar í ár var komin niður aftur á 102. Nú er ætlanin hjá samgonguni at seta prístalið aftur til 100. Hetta førir til eitt uppaftur størri fall í realløninni.

Nevnast kann eisini, at í september 1981 vórðu óbeinleiðis skattir hækkaðir í so stóran mun, at hetta varð mett at geva landskassantum eina meirinntøku uppá umleið 50 mió. kr. um árið. Somuleiðis kann verða nevnt, at skattastigin ikki er javnførdur, við tí úrsliti, at beinleiðis skattirnir eisini eru hækkaðir. Javnaðarflokkurin heldur, at tey, sum eru ringast fyri — tær barnaríku familjurnar og pensionistarnir — eiga at fáa eitt viðurlag fyri hetta.

Flokkurin loyvir sær tí at koma við uppskoti um broytingar í skattalógini. Talan er um broytingar, sum veita ávísan lætta til tær barnaríku familjurnar og til pensionistarnar. Hesar broytingar verða mettar at kosta tilsamans 18 mió. kr., og eigur hædd at verða tikin fyri hesum nú fíggjarlógin fyri 1983/84 kemur til endaliga viðgerð á tingi.

Fyri at lætta um hjá teimum barnaríku familjunum verður skotið upp at hækka barnafrádráttin í landsskattinum við 300 kr., úr 1200 kr. upp í 1500 kr. fyri hvørt barn. Hetta kemur at kosta landskassanum 3,8 mió. kr. um árið.

Broytingarnar, sum vórðu gjørdar í skattalógini í 1978, førdu við sær, at fólkapensionistar ikki fingu skatt. Men við tað at pensiónirnar eru hækkaðar við prístalinum, er støðan broytt hesi árini við tí úrsliti, at fólkapensionistar nú fáa skatt sum víst her:

| | |
|---|---|
| Eini hjún, sum verða skattað av hvør síni helvt av eini fólkapensión fyri tvey, verða skattað av hvør sínum | kr. 19.000,00 |
| bruttoskatturin av hesum verður | — 7.372,00 |
| persónsfrádrátturin verður | — 3.700,00 |
| nettoskatturin verður | — 3.672,00 |
| hjá báðum verður skatturin | — 7.344,00 |

| | |
|---|---|
| Ein einsamallur pensionistur verður skattaður av | kr. 26.000,00 |
| bruttoskatturin av hesum verður | — 10.148,00 |
| persónsfrádrátturin verður | — 6.500,00 |
| nettoskatturin verður | — 3.648,00 |

Her er roknað við hægsta skattaprosenti í landinum, nevniliga 18,8.

Skulu fólkapensionistar aftur sleppa undan at gjalda skatt, soleiðis sum gjørt varð í 1978, so verður neyðugt at hækka persónsfrádráttin hjá hjúnum úr kr. 3.700,00 upp í kr. 7.400,00 og hjá einsamøllum pensionistum úr kr. 6.500,00 upp í kr. 10.200,00. Hetta verður mett at kosta landskassanum umleið 14 mió. kr. um árið.

Fyri at pensionistar framyvir skulu sleppa undan at gjalda skatt, verður neyðugt at orða lógina soleiðis, at persónsfrádrátturin verður reguleraður eftir prístalinum.

Verður lógaruppskotið samtykt, fáa pensionistar aftur tær skattasømdir, sum givnar vórðu teimum við skattalógarbroytingunum í 1978, og verða hesar sømdir við prístalsviðgerðini av persónsfrádráttinum tryggjaðar framyvir eisini.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Uppskot Javnaðarfloksins varð framlagt 23. mars 1983 og undir 1. viðgerð 24. í s.m. beint til viðgerðar í skattanevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Hilmar Kass) setir einki uppskot fram við teirri grundgeving, at uppskotið er innbygt í nýggja uppskotið til samtíðarskatting, løgtingsmál nr. 88/1982.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen) mælir til at samtykkja uppskotið og vísir annars til viðmerkingarnar til uppskotið.

2. viðgerð 26. apríl. § 1 fall við 15-0, uppskotið sostatt fallið.

# 90. Javnføring av fólka-, avlamis- og einkjupensión v.m.

Ár 1983, mikudagin 23. mars legði Jákup Lindenskov, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt beinan vegin at fáa í lag samráðingar í felags sosialu nevndini við tí fyri cyga, at fólka-, avlamis- og einkjupensjónirnar v.m. verða javnførdar skjótast gjørligt.«

**Viðmerkingar:**
Í oktober 1980 gjørdi undanfarna landsstýri semju við ríkismyndugleikarnar um at javnføra fólka-, avlamis- og einkjupensiónina v.m. Henda semja umfataði eisini munandi broytingar í lógini um almenna forsorg.

Hóast henda semja sum nevnt varð gjørd í oktober 1980, komu hesar javnføringar av pensiónunum ikki í gildi fyrr enn 1. apríl 1982. Tær áttu at komið í gildi 1. apríl 1981. Umrøddu broytingarnar í forsorgarlógini eru framvegis ikki komnar í gildi. Javnaðarflokkurin hevur ferð eftir ferð átalað hesa óneyðugu drálan frá landsstýrisins síðu.

Semjan frá 1980 førdi upphæddirnar ájavnt við tað, sum var galdandi í Danmark 1. januar 1979. Orsøkin til, at umboðini fyri ríkismyndugleikarnar ikki vildu føra veitingarnar í Føroyum longri enn til tað, sum var galdandi í Danmark 1. januar 1979, var tann, at pensionistar í Danmark hava útreiðslur, sum pensionistar í Føroyum ikki hava. T.d. er støðan tann í Danmark, at almenn gjøld eru á ljós og hita. Hetta er ikki galdandi í Føroyum.

Men hóast hetta metir Javnaðarflokkurin, at sosialu pensiónirnar longu nú áttu at verið javnførdar av nýggjum. Royndirnar sýna, at sitandi landsstýri fremur óneyðugt drál, tá talan er um at fremja sjálvsagdar javnføringar av pensiónunum, og tí metir Javnaðarflokkurin, at hetta uppskotið til samtyktar er neyðugt.

Verða samráðingar tiknar upp í felags sosialu nevndini nú beinan vegin, kunnu vit rokna við eini semju í hesum árinum, soleiðis at nýggjar javnføringar kunnu koma í gildi 1. apríl 1984. Og flokkurin metir ikki, at tær kunnu koma seinni enn nevnda dag.

1. viðgerð 11. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 6. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er framlagt av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 12. aprfl 1983 beint í sosialu nevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe, Frederik Olsen) ásannar, at javnføringin av fólka-, avlamis- og einkjupensjón v.m. er ein spurningur, sum alla tíðlna er aktuellur, og at hesir bólkar eiga at fáa sín rættvísa part av samfelagsframleiðsluni og eisini økingini. Meirilutin vísir annars til, at landsstýrið arbeiðir við málinum, og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Karin Kjølbro) setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina við tí fyri eyga at yvirtaka allar donsku veitingarnar til almannamál í Føroyum sum blokkstuðul.

2. viðgerð 9. mai, atkvøðugreiðsla 10. mai.

Uppskot Javnaðarfloksins fall við 6-0 atkvøðum, og uppskotið til samtyktar frá minniluta í sosialu nevndini (Karin Kjølbro) fall við 6-0 atkvøðum.

# 91. Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar

Ár 1983, mikudagin 23. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar.**

**§1.** Í fíggjarárinum 1983/84 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensjónistar við kr. 1.200 til hvønn pensjónist.

**§2.** Brennistundingurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1983 hava fingið játtað fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensjónina játtaða.

**lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister og enlige forsørgere.**

**§1.** I finansåret 1983/84 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på kr. 1.200 til hver pensionist.

**§2.** Brændselstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1983 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

**§3.** Treytin fyri at fáa brennistudning er, at pensjónisturin við oktober útgjaldingina 1983 hevur rætt til pensjónsviðbót. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

**§4.** Í fíggjarárinum 1983/84 verður úr landskassanum eisini veittur ein brennistudningur við kr. 1.200,- til stakar uppihaldarar við egnum húsarhaldi, sum fáa hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

**§5.** Brennistudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
*2. stk.* Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
*3. stk.* Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

**§6.** Brennistudningurin er ikki skattskyldugur.

**§7.** Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1983.

**§3.** Betingelsen for at opnå brændselstilskud er, at pensionisten ved oktober udbetalingen 1983 er berettiget til pensionstillæg. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

**§4.** I finansåret 1983/84 ydes af landskassen også et brændselstilskud til enlige forsørgere med egen husholdning, som får hjælp ifølge §22 i forsorgsloven.

**§5.** Brændselstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
*Stk. 2.* Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskuddet.
*Stk. 3.* Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

**§6.** Brændselstilskuddet er ikke skattepligtigt.

**§7.** Denne lov får virkning fra 1. april 1983.

**Viðmerkingar:**
Í fíggjarárinum 1980/81 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við kr. 900,- til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við 1.200 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð sambært løgtingslóg nr. 78 frá

11. december 1981 um brennistudning til stakar uppihaldarar brennistudningurin eisini veittur støkum uppihaldarum við egnum húsarhaldi, sum fingu hjálp sambært §22 í forsorgarlógini.

Útreiðslurnar til brennistudningsskipanina vóru í fíggjarárinum 1980/81 og 1981/82 ávikavist 2.606.000 kr. og 3.596.000 kr., og á fíggjarløgtingslógini 1982/83 er játtanin til skipanina 3.500.000 kr., meðan útreiðslurnar á uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1983/84 eru mettar til 3.700.000 kr.

Landsstýrið metir, at tørvur er á, at sami brennistudningur, sum er veittur ávísum pensjónistum og ávísum støkum uppihaldarum í fíggjarárinum 1982/83, verður veittur í fíggjarárinum 1983/84.

Í fíggjarárinum 1982/83 er sambært løgtingslóg nr. 79 frá 21. mai 1982 um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar brennistudningur veittur við 1.200 kr. til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar við egnum húsarhaldi, sum fáa hjálp sambært §22 í forsorgarlógini.

1. viðgerð 11. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram hin 23. mars 1983 av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 12. apríl 1983 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið snýr seg um endurnýggjan av brennistudninginum. Upphæddin er kr. 1.200,00, sum er tann sama sum árið fyri. Nevndin metir, at við lækkandi oljuprísum er saklig grundgeving fyri ikki at hækka veitingina á hesum sinni.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 2. mai. §1 samtykt við 25-0, §§2-6 samtyktar við 25-0, §7 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 4. mai. Uppskot landsstýrisins samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-20-1. Lóg nr. 52 frá 20. mai 1983.

# 92. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Ár 1983, mikudagin 23. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.**

**§1.** Í §3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20. november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya við seinni broytingum verða orðini »30. aprfl 1983« broytt til »30. aprfl 1986«.

**§2.** Henda lóg fær gildi frá 30. aprfl 1983.

**lagtingslov om ændring af lagtingslov om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.**

**§1.** I §3 i lagtingslov nr. 71 af 20. november 1969 om lotteritilladelse til Útvarp Føroya med senere ændringer ændres ordene »30. april 1983« til »30. april 1986«.

**§2.** Denne lov træder i kraft den 30. april 1983.

**Viðmerkingar:**
Útvarp Føroya hevur søkt um, at lógin um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. aprfl 1983, verður endurnýggjað.

Í umsókn um endurnýgging av loyvinum hevur útvarpið upplýst fylgjandi:

Løgtingslóg nr. 55 frá 12. mai 1980 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya fer úr gildi 30. aprfl 1983.

| | | |
|---|---|---|
| Til 497 dráttir er inngoldið | | 19,8 mió. kr. |
| goldið í vinningum | 6,8 mió. kr. | |
| skattur til landskassan | 1,1 — — | |
| | 7,9 mió. kr. | |
| umsitingarútreiðslur | 0,9 — — | 8,8 — — |
| Útvarpsins partur | | 11,0 mió. kr. |

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at lógin verður framlongd, tá útvarpinum tørvar pening til raksturin, serstakliga til rentur og avdrátt av lánum í sambandi við nýggju útvarpshúsini.

1. viðgerð 24. mars. Loyvi at frávíkja tíðarfreistina til viðgerð av málinum varð givið. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 8. apríl. §1 varð samtykt við 21-0, §2 uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð samtykt við 21-0.

3. viðgerð 13. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 512-90. Lóg nr. 45 frá 3. mai 1983.

---

# 93. Uppskot um bókaforlag

Ár 1983, mikudagin 23. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um »Bókaforlag landsins«.**

**§1.** Sett verður á stovn »Bókaforlag landsins« við tí endamáli at skipa fyri útgávu av føgrum bókmentum, yrkisbókmentum, barnabókum, skúlabókum v.m.

*2. stk.* Bókaforlagi landsins er eisini loyvt at geva út plátur, bond, vidcokassettir, stuttfilmar v.m.

**§2.** Bókaforlag landsins verður rikið sum sjálvstøðugur og óheftur stovnur undir landinum.

**§3.** Bókaforlag landsins verður stýrt av einum stýri við trimum limum, sum verður sett saman soleiðis: Løgtingið velur ein, og føroyskir rithøvundar velja tveir limir.

*2. stk.* Til at skipa fyri dagliga virksemi bókaforlagsins setir stýrið fyristøðufólk við kunnleika til føroyskar eins væl og alheims bókmentir.

*3. stk.* Stýrið fyri Bókaforlagi landsins ger nágreiniliga reglugerð fyri virki forlagsins.

**§ 4.** Landskassin ber kostnaðin av rakstri og útgávum almenna bókaforlagsins sambært hesi lóg, og landskassin fær allar inntøkur av bóka- og aðrari útgávu.

**§5.** Henda lóg kemur í gildi tann 1. oktober 1983.

**Viðmerkingar:**

Hvørt ár verða umleið 100 bøkur givnar út í Føroyum. Hesar umleið 100 bøkurnar fevna um fagrar bókmentir, yrkislesnað, skúlabøkur og barnabøkur.

Grundarlagið undir bókaútgávu í Føroyum er ógvuliga ymist. Tað er royndur lutur, at hetta, at geva bøkur út, er eitt ógvuliga

tungt tak fíggjarliga. Til sjálva útgávuna av bókunum hava høvundar ella forløg høvi til at søkja sær fíggjarligan stuðul hjá føroyskum ella útlendskum mentannargrunnum. Í hesum sambandi er at nevna, at mentannargrunnur Føroya Løgtings hevur verið føroyskum rithøvundum og forløgum ein góður stuðul. Men stuðulin frá mentanargrunninum røkkur á ongan hátt til allan framleiðslukostnaðin, við tað at mentanargrunnurin sjálfan stuðlar við meiri enn einum triðingi av tí, tað kostar at prenta bókina. Tá hugsað verður um, at ein stórur partur av bókaútgávu okkara fer fram á sokallaðum egnum forlag ella á forlag, sum í roynd og veru er at rokna sum egið forlag, er greitt, at bókaútgáva er eitt ógvuliga tungt tak, serstakliga hjá tí einstaka rithøvundanum.

Hesi viðurskifti stava frá tí veruleika, at vit í Føroyum ongan veruligan mentanarpolitikk hava.

Eitt endamálið við hesum lógaruppskoti er tí at taka stig til almennan mentanarpolitikk, samstundis sum hetta er ein roynd at lætta um skapandi virksemi hjá tí parti av okkara listafólki, sum í løtuni hava tey vánaligastu arbeiðskorini.

Endamálið við hesum uppskoti er eisini at royna at skráseta eina almenna viðurkenning av okkara skrivandi fólki. Hetta kann gerast við at geva hesum fólkum sømilig arbeiðskor, og hetta vil eisini siga, at allir rithøvundar eiga at fáa eina sømiliga løn fyri sítt arbeiði — nakað, ið eftir javnaðarfloksins meting bert kann fremjast gjøgnum eitt alment ríkið og alment fíggjað bókaforlag.

1. viðgerð 11. aprfl, framhald 12. aprfl. Uppskot um at beina málið í skúlanevnd fall við 16-0 og uppskot um at beina málið í 5-manna mentamálanevnd fall við 15-0. Málið varð síðani beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 12. aprfl 1983 beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og eisini havt fund við umboð fyri Rithøvundafelag Føroya. Nevndin er samd um, at tað hevur stóran týdning at loysa hetta mál á ein hátt, sum tryggjar javna útgávu av nýggjum føroyskum bókmentum.

Kortini metir nevndin seg ikki at hava viðgjørt málið til fulnar og ynskir at viðgera tað víðari í komandi tingsetu.

Nevndin setur tí fram hetta

**Uppskot
til
samtyktar**

Løgtingsmál nr. 93/1982: Uppskot um bókaforlag verður viðgjørt víðari í Løgtingsins sosialu nevnd í tingsetuni 1983.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 23-0 atkvøðum.

---

# 94. Verja við einkarrætti til sniðið á føroyska bátinum

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot
til
samtyktar**

Føroya løgting áleggur landsstýrinum beinanvegin at søkja um verju við einkarrætti til sniðið á føroyska bátinum og at gera hetta á altjóða stigi.

**Viðmerkingar:**
Sniðið á føroyska bátinum er einastandandi til sjóføri. Sniðið er so gamalt, at eingin einstaklingur kann gera krav uppá at eiga tað ella rættin til tað. Sniðið á føroyska bátinum er at rokna sum føroysk fólkaogn. Tí má tað metast, at Føroyar sum tjóð eiga rættin til hetta einastandandi bátasnið.

Seinastu tíðina hevur ikki sørt av áhuga uttanlands frá verið fyri

hesum bátasniði. Ávíst firma hevur havt samráðingar við indar um sølu av »licens« til hesa okkara fólkaogn. Eisini frættist, at útlendskir bátabyggjarar eru í Føroyum og nema sær kunnleika í føroyskum bátasniði.

Skal sniðið á føroyska hátinum seljast øðrum, eigur tað at verða gjørt undir eftirliti, og møguligur ágóði eigur at koma fólkinum (landskassanum) til góðar.

Søla av sniði ella licens eigur ikki at kunna fara fram og verða framt av hvørjum Peri og Póli uttan eftirlit, og tí eigur landsstýrið at taka stig til at søkja um verju við einkarrætti (patent ella mønsterbeskyttelse) fyri allar støddir av føroyskum bátum.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 26. apríl. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

---

# 95. Rættur kvinnunnar til at arbeiða parttíð

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið á ólavsøku uppskot um løgtingslóg um rætt kvinnunnar til at arbeiða parttíð á øllum arbeiðsplássum. Uppskotið verður at gera í tráð við viðmerkingarnar niðanfyri.

**Viðmerkingar:**
Útbyggingin av okkara samfelag, hvat skyldur einstaklingsins viðvíkir, hevur verið soleiðis, at flestu yngri húsmøður hava verið noyddar út at arbeiða fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Av umhugsni fyri børnum sínum kundi mong kvinnan hugsað sær bert at arbeitt parttíð, til dømis hálvan dag. Mangar teirra kundu hugsað sær at verið tvær um sama arbeiði, soleiðis at tær skiftust og kundu passað børnini hjá hvør øðrum. Ein skipan, ið vildi lætt um trýstið á og mangulin uppá dagrøktarpláss til børn.

Men tíanveri eru ikki allir arbeiðsgevarar, privatir sum almennir, so glaðir fyri eina tílíka skipan. Tær kvinnur, sum hava dittað sær at reist tankan, eru aloftast avvístar.

Tað er av størsta týdningi, at kvinnurnar fáa loyvi til at hjálpa til við at fáa endarnar at røkka saman, men tað er ikki av minni týdningi, at barnið sum mest fær tann tryggleikan, tað er at hava eina móður í heiminum, at kenna.

Í einum fyrilestri á fyrsta kvinnutinginum vísti ein kvinnuligur lækni á, hvussu ómetaliga stóran týdning tað hevði fyri barnið, at móðurin var sum mest um tað, og helst skuldi eingin annar passa tað fyrstu 3 liviárini.

Tað vil vera ávegis móti tí fyrimyndarliga, um lóggivið varð soleiðis, at mammur fingu høvi til bert at arbeitt uttan fyri heimið, so leingi tær mettu tað neyðugt fyri at fáa endarnar at røkka saman. Lógin eigur at verja kvinnuna móti uppsøgn við teirri motivering, at hon bert kann arbeiða parttíð.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint til aðru viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 26. apríl, framhald á seinni fundi sama dag. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og varð við 2. viðgerð hin 26. apríl beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Frederik Olsen og Jógvan Sundstein) heldur, at uppskotið hjá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum er ov avgjørt og gevur landsstýrinum ov lítið av tíð til at viðgera málið,

men er annars samdur við uppskotsstillaran um, at tað áttu at verið meiri skipaðar reglur fyri, at annar hjúnafelagin og serliga kvinnan kann arbeiða parttíð.

Meirilutin setur fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið biður landsstýrið í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum gera lóggávu, sum tryggjar kvinnuni, ella um neyðugt manninum, rættin til at arbeiða parttíð.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) tekur ikki undir við uppskoti Framburðs- og Fiskivinnufloksins. Uppskotið er beinleiðis í stríð við samtyktina um javnstøðu milluin kynini. Leggjast má aftrat, at tað er rættiliga marghátthigt, at uppskotið bert viðger kvinnuna sum part av eini familju, har ein maður ella pápi altíð er við, tá hugsað verður um, at í dag verður ein triðingur av øllum børnum føddur uttan fyri hjúnalag.

Eisini hendir, at kona og maður gerast einkja ella einkjumaður, heldur ikki er tað so óvanligt longur, at hjún verða sundurlisin og skild.

Um uppskotið verður samtykt, kann tað ógvuliga lætt henda, at vit skjótt fáa serlig kvinnuarbeiði, ið bert eru til hálvan dag, og so er ógjørligt hjá ógiftum mammum at lívbjarga sær. Umframt sosialu avleiðingarnar fyri hin einstaka kann slík skipan eisini fáa ta samfelagsligu avleiðing, at kvinnur í enn størri mun gerast eitt arbeiðsorkuuppískoyti, ið einans sleppur til arbeiðis, tí menn ikki megna alt tað, ið skal gerast, eins og bert menn og ongar kvinnur koma at sita í leiðandi størvum.

Um hetta uppskot hevur til endamáls at skapa størri trivnað hjá børnum og harvið hjá allari familjuni, so er vert at vísa á føroyskt og útlendskt tilfar um hesi viðurskifti frá ST-barnaárinum, har tað týðiliga vísti seg, at tað, børn og foreldur vildu, var, at *bæði* foreldur høvdu niðursetta arbeiðstíð. Miðað var ímóti, at øll fólk við børnum undir skúlaaldur — tað merkir bæði maður og kvinna — skuldu hava 6 tímars arbeiðsdag.

Vit taka undir við hesi hugsan, men mæla til sum ein byrjan, at øll fólk, ið hava børn undir skúlaaldur, skulu hava møguleika

fyri 7 tíma arbeiðsdegi.

Minnilutin setur tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera eina lóg og reglugerð, sum heimilar øllum foreldrum at børnum undir skúlaaldur 7 tíma arbeiðsdag, um tey sjálvi ynskja tað.

Henda skipan skal byrja, samstundis sum samtíðarskatturin verður settur í verk.

17. mai framhaldandi 2. viðgerð. Upprunaliga uppskotið fall við 9-0 atkvøðum. Uppskot til samtyktar frá meirilutanum í sosialu nevndini (Eli Nolsøe, Frederik Olsen, Jógvan Sundstein) fall við 15-0 og frá minnilutanum (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) fall við 15-0.

---

# 96. Rættvísgering av dagpeningaskipanini

Ár 1983, fríggadagin 25. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya løgting áleggur landstýrinum beinanvegin at fyriskipa broytingar í lóg og/ella reglugerð fyri dagpeningaskipanina soleiðis, at fólk, sum eru umfatað av dagpeningaskipanini, men sum óviljað ikki hava havt arbeiði/inntøku seinastu 5 vikurnar, áðrenn tey gerast óarbeiðsfør, fáa dagpening, ið er grundaður á vanliga arbeiðsmannaløn/minstaløn í staðin fyri á regluna um 5 vikursskeiðið og tey í reglugerðini hemilaðu undantøkini.

**Viðmerkingar:**
Vit hava í løtuni eina dagpeningaskipan, ið virkar so ójavnt, at ein og sami persónur fyri somu sjúku ella skaðatilburð kann fáa upp til 80% av vanligari inntøku í dagpeningi, um so er, at arbeiðsgevari hansara hevur kunnað havt viðkomandi í arbeiði hvønn dag seinastu 5 vikurnar, ella ongan dagpening fáa, um arbeiðsgevarin ikki hevur kunnað havt hann í arbeiði seinastu 5 vikurnar. Hetta eru greinsutilburðir, men hvar innan hesar greinsur, ein er tryggjaður, er ongin, eftir nú galdandi reglum, harri yvir.

Dagpeningaskipanin er nú so gomul, at tíðin er komin at rætta tey ringastu brekini.

Upprunaliga var í kunngerð nr. 51 frá 26. juni (1. juli) 1979 um dagpening gjørd ein roynd at binda um heilan fingur, men hetta hevur tíanverri ikki eydnast. Nevnda kunngerð loyvir frávik frá 5 vikureglunum, tá talan er um útróðrarmenn, arbeiðsfólk á flakavirkjum ella øðrum virkjum, sum eru beinleiðis bundin at útróðrarlíkindunum í teimum førum, tá vinnuloysið stavar beinleiðis frá vánaligum útróðrarlíkindum.

Tey ymsu virkini kring landið liggja til skiftandi árstíðir still vegna manglandi rávørutilgongd. Eitt nú liggja virkir, ið bundin eru at smáum og miðalstórum trolarum, ofta still fram móti endanum á árinum og til tíðir ein part av januar mánaði.

Á sama virki kann februar mánaður fyri tann skuld gerast sannur metmánaður í inntøku. Kemur løntakari til skaða á tílíkum virki fyrsta arbeiðsdagin eftir longri arbeiðsstøðg, missur hann ikki bert møguliga inntøku ta tíð, hann er sjúkur, men hann fær heldur ongan dagpening.

Higartil hevur verið eitt ótal av tílíkum tilburðum, og má tíðin tí vera inni, at rættað verður uppá henda skeivleika.

1. viðgerð 12. aprfl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 6. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er framlagt hin 25. mars 1983 av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 12. apríl 1983 beint í sosialu nevndina.

Síðani málið var til viðgerðar, hevur landsstýrið í skrivi til tingið boðað frá, at tað sambært skriv løgtingsins dagfest 2. mars 1982 um avgreiðslu av løgtingsmáli nr. 48/1981 hevur sett ein arbeiðsbólk

at kanna dagpeningakunngerðina. Nevndin átalar, at landsstýrið hevur havt meira enn eitt ár um at seta henda bólk, men tekur annars skriv landsstýrisins til eftirtektar.

Samstundis heitir sosiala nevndin á landsstýrið um at áleggja arbeiðsbólkinum eisini at taka við í síni arbeiðsuppgávu tann spurning, sum er drigin fram í hesum tingmáli um 5 vika regluna.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Hilmar Bech og Karin Kjølbro) kann ikki taka skriv landsstýrisins dagfest 18. apríl 1983 til eftirtektar, soleiðis sum tað er orðað. Í hesum skrivi verður sagt, at landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at kanna dagpeningakunngerðina, og at ætlan landsstýrisins er, at arbeiðsbólkurin skal endurskoða kunngerð um dagpening nr. 51 frá 26. juni 1979, heruppií innarbeiða tær generellu avgerðir, sum eru tiknar, og ta mannagongd, sum er fylgd tey árini, kunngerðin hevur verið í gildi, meðan tað eftir verandi umstøðum ikki er ætlan landsstýrisins at broyta reglurnar í dagpeningalógini, soleiðis at sjúkradagpeningurin verður hækkaður, at útrokningargrundarlagið verður broytt, at arbeiðsmaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningaskipanini, ella at sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi.

Umboð javnaðarfloksins og tjóðveldisfloksins kunnu taka undir við, at ein arbeiðsbólkur er settur at endurskoða kunngerðina um sjúkradagpening m.a. við tí fyri eyga at innarbeiða tær generellu avgerðir, sum eru tiknar, og ta mannagongd, sum er fylgd tey árini, kunngerðin hevur verið í gildi. Men umframt hetta halda umboð javnaðarfloksins og tjóðveldisfloksins, at arbeiðsbólkurin eisini eigur at gera uppskot um: 1) at sjúkradagpeningurin verður hækkaður úr 80 uppí 90%, 2) at sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi, 3) at arbeiðsmarknaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningaskipanini, og 4) at útrokningargrundarlagið verður broytt, so at veitingin í størri mun enn nú verður løntakaranum at bata.

Minnilutin vísir annars til uppskot og viðmerkingar javnaðarfloksins í løgtingsmáli nr. 48/1981: Sjúkradagpeningaskipan. Umboð javnaðarfloksins og tjóðveldisfloksins taka undir við meirilutanum, tá hesin átalar, at tað hevur tikið landsstýrinum meira enn eitt ár at seta tann arbeiðsbólkin, sum landsstýrinum varð álagt at seta við løgtingssamtyktini í løgtingsmáli nr. 48/1981.

Út frá hesum viðmerkingum seta umboð javnaðarfloksins og

tjóðveldisfloksins fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at skipa so fyri, at arbeiðsbólkurin, sum er settur at endurskoða sjúkradagpeningaskipanina, eisini skal gera upskot um:
1) at sjúkradagpeningurin verður hækkaður úr 80 upp í 90%,
2) at sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi,
3) at arbeiðsmarknaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningaskipanini,
4) at útrokningargrundarlagið verður broytt, so at veitingin í størri mun enn nú verður løntakarunum at bata.

2. viðgerð 9. mai, atkvøðugreiðsla 10. mai. Uppskotið frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum fall við 13-0 atkvøðum, og uppskotið frá Hilmar Bech og Karin Kjølbro fall við 14-0.

FØROYA LANDSSTÝRI

F.L.j.nr. 1010-12-2-1/83

3800 Tórshavn, 18. apríl 1982
IC/IS

Við hesum verður til kunningar sagt frá, at landsstýrið í dag hevur sett ein arbeiðsbólk at kanna dagpeningakunngerðina.

Setanarskrivið er soljóðandi:

»Vísandi til hjálagda skriv løgtingsins dagfest 2. mars 1982 um avgreiðslu av løgtingsmáli nr. 48/1981: Sjúkradagpeningaskipan, verður við hesum sagt frá, at landsstýrið hevur samtykt at seta ein arbeiðsbólk at kanna dagpeningakunngerðina.

Arbeiðsbólkurin fær hesar limir:
Klaus Hermann, almannastjóra,
Steinbjørn Lilaa, leiðara av dagpeningaskipanini,
Inger Christiansen, fulltrúa, og
Ingeborg, Winther, formann Føroya arbeiðarafelags.

Samstundis sum sagt verður frá hesum, skal verða sagt frá, at ætlan landsstýrisins er, at arbeiðsbólkurin skal endurskoða

kunngerð um dagpening nr. 51 frá 26. juni 1979 og heruppií innarbeiða tær generellu avgerðir, sum eru tiknar, og ta mannagongd, sum er fylgd, tey árini kunngerðin hevur verið í gildi, meðan tað eftir verandi umstøðum ikki er ætlan landstýrisins at broyta reglurnar í dagpeningalógini, so at sjúkradagpeningurin verður hækkaður, útrokningargrundarlagið broytt, arbeiðsmarknaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningaskipanini, ella sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi.

Landsstýrið heitir samstundis við hesum á Klaus Hermann, almannastjóra, um at kalla arbeiðsbólkin saman til fyrsta fundin.«

Allir tinglimir

Eilif Samuelsen /J. Djurhuus
landsstýrismaður

# 97. Lán til Telefonverk Føroya Løgtings

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg nm lán til Telefonverk Føroya Løgtings.**

§1. Telefonverk Føroya Løgtings verður heimilað í fíggjarárinum 1983/84 at læna upp til 80 mió.kr., ella mótvirðið av hesi upphædd heilt ella lutvíst í fremmandum gjaldoyra, til endurfíggjan av gomlum lánum og til fíggjan av íløgum.

§2. Landsstýrið fær heimild at veðhalda landskassans vegna fyri lánum tikin samb. § 1.

§3. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

**lagtingslov om lån til Telefonverk Føroya Løgtings.**

§1. Telefonverk Føroya Løgtings får hjemmel til i finansåret 1983/84 at optage lån op til 80 mio.kr., eller modværdien af dette beløb helt eller delvis i fremmed valuta, til refinansiering af ældre lån og til finansiering af investeringer.

§2. Landstyret får hjemmel til på landskassens vegne at garantere for lån, optaget i henhold til § 1.

§3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Sambært metingum telefonverksins má telefonverkið metast at vera útbygt tekniskt, soleiðis at dagligi tørvurin fyri telefonsambandi er nøktaður. Tann 1. mars 1983 vóru 15277 felagar. Tað tykist, sum tilgongdin av feløgum kann væntast at liggja um 5-6% komandi ár. Ein tilgongd uppá 800-1000 felagar ber í sær eina íløgu uppá umleið 16 mió.kr.

Løgtingstíðindi 1982 A 67

Henda upphædd er tikin við í útrokningina av tørvinum fyri tí lániheimild, søkt verður um smb. § 1. Hin parturin av teimum 80 mió.kr. er ætlaður til partvísa umskiftan av eldri lánum, sum falla til gjaldingar í 1983/84. Samlaði fíggjartørvurin er uppgjørdur í samsvar við fíggjarætlan dagfest 22. mars 1983.

Tann stóra útbyggingin av telefonverkinum er fíggjað við lánum. Tað hevur sum heild ikki verið gjørligt at fáa so langfreistað lán, at lánstíðin samsvarar við livialdurin hjá tekniska anlegginum. Seinastu árini hevur rentan á uttanlandslánum verið óvanliga høg og kursbroytingarnar stórar og brádligar. Sum heild hevur krónan verið fyri munandi virðisminking samanborið við tey gjaldoyru, ið uttanlandslán vanliga verða upptikin í. Tey áhaldandi kurstap, ið av hesum standast, hava ikki í nóg stóran mun verið løgd til grund fyri útrokning av takstunum við tí úrsliti, at inntøkurnar hjá telefonverkinum hava verið ov smáar. Eisini av øðrum orsøkum, ið lutvíst hava ligið uttan fyri telefonverksins ávirkan, hevur svíkur verið í inntøkunum inntil nýliga.

Úrslitið av hesi gongd er, at telefonverkið roknskaparliga nú stendur uttan eginfíggjan. Fyri at venda hesi gongd er óivað rættast í framtíðini meira regluliga at broyta telefontakstirnar samsvarandi prísgongdini í samfelagnum annars og serliga við broytingum í rentu- og kurstapsbyrði telefonverksins í huga.

1. viðgerð 11. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 11. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 11. apríl beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at Telefonverk Føroya Løgtings fær heimild í fíggjarárinum 1983/84 at læna upp til kr. 80 mió. ella mótvirðið hertil, heilt ella lutvíst í fremmandum gjaldoyra. Peningurin skal nýtast til endurfíggjan av gomlum lánum og til fíggjan av íløgum.

Frá grannskoðara Telefonverksins er útvegað fíggjarætlan fyri 1982/83 og 1983/84, dagfest 22. mars 1983. Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 28. apríl 1983 viðgjørt málið. Nevndu fíggjarætlanir vóru kannaðar og metingarnar og fortreytir teirra tiknar til eftir-

tektar.

Nevndarlimirnir Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen taka einmælt undir við málinum og mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Adolf V. Hansen setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa soleiðis fyri, at leiðsla Telefonverksins verður umskipað, soleiðis at sjálvstøðugir ábyrgdardeildarleiðarar verða fyri ávikavist ta økonomisku deildina og ta teknisku deildina.

Framhaldandi 2. viðgerð 6. mai. §1. varð samtykt við 24-2, §2 samtykt við 25-2, §3 uttan atkvøðugreiðslu. Uppskot til samtyktar frá Adolf Hansen fall við 14-0.

3. viðgerð 10. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 26 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

F.L.j.nr. 1900-3-18. Lóg nr. 60 frá 6. juni 1983

# 98. Lækking av útlánsrentuni

Ár 1983, hósdagin 24. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt at taka upp samráðingar við føroysku peningastovnarnar við tí fyri eyga at fáa hesar stovnar at lækka útlánsrentuna, soleiðis at føroysku lænararnir kunnu fáa gagn av tí falli í útlánsrentuni, sum yvirhøvur hevur verið í vesturheiminum ta seinastu tíðina.

**Viðmerkingar:**

Árini 1979-83 hækkaði danska diskontoin — sum m.a. er tann renta, peningastovnar okkara gjalda í rentu fyri tann pening, teir læna úr tjóðbankanum — úr 8-9% upp í 13-14%, og seint í 1982 var diskontoin 14%. Henda hækking bar í sær, at danskir peningastovnar hækkaðu rentu sína heilt upp í 20% fyri útlán og í 12% fyri innlán í serligum førum.

Rentan á danska obligatiónsmarknaðinum hevur samstundis ligið uppi á fleiri og tjúgu prosentum.

Við teirri grundgeving, at vandi var fyri peningaflutningi úr føroyskum til danskar bankar, hækkaðu føroysku peningastovnarnir rentuna, hvørja ferð diskontoin hækkaði, og okkara peningastovnar hava í seinastuni virkað við so stórum rentumarginali sum frá 4% upp í 10%, og inntøkur stovnanna hava tí eisini, sum júst framløgdu ársúrslit sýna, verið rættuliga høgar í 1982.

Nú er diskontoin so líðandi farin niður aftur, og er hon í løtuni 8 1/2%. Grundgevingin er generella rentufallið í londum uttanum okkum og tørvurin á at styrkja kappingarføri danska vinnulívsins.

Nú hesar lækkingar eru framdar í fleiri stigum úr 14% niður í 8 1/2%, hava vit ongantíð hoyrt frá peningastovnum okkara um rentulækking, ella um tørvin á at styrkja kappingarføri vinnulívsins, herundir skipaflotans og flakavirkjanna, sum skulu kappast við donsk, norsk, bretsk veiðufør og virkir — fyri ikki at tala um ídnaðarvirki okkara, sum skulu kappast við statsstuðlaðan innflutning úr øðrum londum.

At enda er neyðugt at vísa á, at tær mongu skerjingar, láginntøkufólki hevur verið fyri, gera, at hesi illa orka at knógva undir rentum upp í 15-15 1/2% fyri lán til búseting og bústað, sum eru útreiðslur, øll mugu bera.

Tað hastar tí almikið at fáa framt tilsvarandi rentulækking her heima sum hana, framd er í Danmark og næstu grannalondum okkara.

1. viðgerð 11. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum 14. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum skal áleggjast landsstýrinum at taka upp samráðingar við peningastovnarnar um lækking av útlánsrentuni.

Nevndin hevur havt fund við Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann, um málið, og upplýsti hann, at landsstýrið longu hevur havt fund við peningastovnarnar um rentuna. Hann upplýsti, at peningastovnarnir nakað skjótt fara at taka støðu til eina justering av rentuni.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Øssur Dam Jacobsen og Svend Aage Ellefsen) vísir til, at landsstýrið longu hevur havt umrøddu samráðingar, og setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Erlendur Patursson) skilar til:

Í teirri heimastýrislóg, ið løgtingið gekk undir í 1948, er einki sagt um, at føroyska heimastýrið hevur nakran myndugleika viðvíkjandi peningastovnum og rentupolitikki. Hesi málsøki eru í heimastýrislógini hvørki nevnd sum A ella B mál. Tey eru tí donsk ríkismál burturav, smb. §6: »Anliggender, der ikke i medfør af denne lov henhører under det færøske hjemmestyre, varetage som rigets fællesanliggender af rigsmyndighederne.«

Hóast henda veruleika hava í løgtinginum av og á verið gjørdar royndir til at lóggeva ella gera samtyktir hesum viðvíkjandi. Sum dømi um slíkar royndir kunnu nevnast:

1. Uppskot 9. januar 1957 soljóðandi:

»Allir peningastovnar í Føroyum eru skyldugir at veita Føroya løgtingi fyrsta rætt at læna úr stovnunum til skipakeyp eins og til skipabygging tann pening, ið tøkur er til láns.

Fyri hesi lán kunnu peningastovnarnir ikki taka hægri rentu enn 1/2% av innseturentuni.

Hetta uppskot fall.

2. Uppskot 31. januar 1958 soljóðandi:

»Allir peningastovnar í Føroyum eru skyldugir at veita Føroya løgtingi — landskassanum — fyrsta rætt at læna úr stovnunum til skipabygging eins og til skipakeyp tann pening, ið tøkur er til láns.«

Eisini hetta uppskot fall.

3. Uppskot 11. februar 1950:

»Føroya landsstýri kann eftir tilmæli frá bankaeftirlitinum seta reglur um rentuhæddir av útgerðarlánum, lánum við veð í skipum ella øðrum lánum til rakstur av sjóvinnuni ella virkjum á landi við tilgerð av ráevnum av sjónum. Bankaeftirlitið verður biðið um at ráða til so lága útlánsrentu sum møguligt.«

Hetta uppskot varð samtykt, men danski ríkisumboðsmaðurin klagaði løgtingið fyri donsku ríkisstjórnini, sum boðaði frá, at í heimastýrislógini var eingin heimild til hjá løgtinginum at lóggeva um slík viðurskifti, smb. skriv 18. september 1951. Lógin kom tí onga tíð í gildi.

Nú er so aftur gjørd roynd til at fáa løgtingið til at leggja seg út í hesi viðurskifti.

Av teimum dømum, ið her hava verið nevnd, mátti tað tó staðið løgtingsmonnum greitt, at tað er fáfongt hjá løglinginum at royna at sleppa út um tað mark, sum heimastýrislógin setir okkum, meðan henda lóg er í gildi. Tað, sum uppskot javnaðarfloksins umtalar, er, sum longu víst á, donsk ríkismál, bæði í lóggávu og í umsiting.

Har afturat er at nevna, at annar av bankum landsins er danskur. Og tann landsbanki, ið løgtingið við lóg hevur fyriskipað, skal setast á stovn, er ikki enn komin.

Skal løgtingið makta nakað í hesum týdningarikla máli, banka- og rentupolitikkinum, mugu tí fyrst tvær treytir uppfyllast. Ein er tann, at slíkar broytingar verða gjørdar í heimastýrislógini,

at hesi málsøki verða løgd undir ræði heimastýrisins. Hin er tann, at landsbankin verður settur á stovn.

Minnilutin (Erlendur Patursson) setir tí í staðin fyri uppskot javnaðarfloksins fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið fyriskipan, at tiknar verða upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina, at slíkar broytingar verða gjørdar í heimastýrislógini, at øll lóggáva viðvíkjandi peningamálum, her undir bankalóggáva, verður løgd undir løgtingið.
2. Løgtingið áleggur landsstýrinum ikki seinni enn 1. januar 1984 at seta Landsbanka Føroya á stovn, smbr. lóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya.

Minnilutin (Adolf Hansen) tekur undir við uppskotinum og førir fram, at í útlánsrentunum hjá peningastovnunum er innroknað eitt risiko-prosenttal at standa ímóti tapi við.

Hesi risikoprosent fáa peningastovnarnir eisini av lánum við landskassaveðhaldi. Av tí at landskassin í hesum førum tekur alla risikoina, metir minnilutin tað rætt, at risikorentan fer í ein grunn, sum skal taka um endan, tá landskassaveðhald verða effektiv.

Út frá hesum setir minnilutin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við peningastovnarnar um stovnan av einum almennum tapstrygdargrunni, hvørs inntøka skal vera risikorentan av landskassaveðhildnum lánum her á landi.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur undir við uppskotinum frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 2. mai. Upprunauppskotið fall við 13-0. Uppskot til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum pkt. 1 fall við 8-0, pkt. 2 við 14-0. Uppskot frá Adolf Hansen og Jørgen Thomsen fall við 9-0.

# 99. Arbeiðseftirlit

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum:

1) At skipa soleiðis fyri, at »maskin- og arbeiðseftirlitið« verður býtt sundur í tveir stovnar, soleiðis at arbeiðseftirlitið verður skipað sum sjálvstøðugur stovnur við egnari leiðslu og egnari fíggjarætlan.
2) At stíla soleiðis fyri, at henda skipan kann fara at virka frá 1. apríl 1984.

**Viðmerkingar:**

Sum kunnugt hevur løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd virkað síðan 1. januar 1975. Henda lóg var, tá hon kom, í sjálvum sær eitt stórt framstig fyri trygdina hjá øllum teimum, sum eru í vinnu, í mun til støðu teirra, áður lógin var sett í gildi.

Ein fyritreytin fyri, at henda lóg skal kunna virka eftir ætlan til gagns fyri arbeiðsfólk, er eitt væl virkandi arbeiðseftirlit.

Fyritreytin fyri einum vælvirkandi eftirliti eru neyðturviligar játtanir til størv og virksemi og møguleiki fyri at virka sjálvstøðugt og óheft av øðrum uppgávum enn teimum, ið lógin fyrisetir.

Føroysk fakfeløg hava fleiri ferðir víst á, at tað er óheppið, at arbeiðseftirlitið er partur av øðrum stovni. Samstundis hava feløgini víst á, at arbeiðseftirlitið best fær virkað sum sjálvstøðugur stovnur við egnari leiðslu, og hava tey tí sett fram ynski um, at arbeiðseftirlitið verður skilt út frá tí stovni, vit í dag í tí dagliga kalla Teknisku Deild. Javnaðarflokkurin hevur áður gjøgnum

umsitingina og í fíggjarnevndini roynt at fremja hesa broyting í viðurskiftum viðvíkjandi arbeiðseftirlitinum, men hetta hevur ikki eydnast. Tí setir flokkurin nú fram soljóðandi uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 12. aprfl 1983 beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Frederik Olsen og Jógvan Sundstein) metir, at spurningurin, sum uppskotið snýr seg um, er av administrativum slagi og tí má avgerast av landsstýrinum. Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

Nevndin ger annars vart við, at hon hevur fingið til viðgerðar skriv frá Føroya Arbeiðarafelag um at seta ein arbeiðsmedisinara. Í hesum sambandi verður heitt á landsstýrið um aftur at viðgera »Kgl. anordning om embedslægeinstutionen m.v.« og koma við uppskoti í hesum máli.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið frá Javnaðarflokkinum fall við 13-0 atkvøðum.

# 100. Fyrispurningar

*Sí blaðsíðu 716.*

# 101. Eykastudningur til ávísar havnavíðkanir

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um eykastudning til ávísar havnavíðkanir.**

§1. Sum uppískoyti til tær játtanir, sum við løgtingslóg nr. 44 frá 23. juni 1978: Løgtingslóg um 6 ára ætlan fyri útbygging av havnunum, vórðu veittar til víðkan av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, verður úr landskassanum veittur studningur svarandi til 75% av tí upphædd, byggiútreiðslurnar til avvarðandi havnavíðkan verða hægri enn tann í omanfyri nevndu løgtingslóg tilskilaði størsti studningsborni byggipeningur, tó í mesta lagi 75% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum.

Studningurin verður goldin við einum triðingi hvørt av fíggjarárunum 1984/85, 1985/86 og 1986/87:

| *Kommuna* | kr. |
|---|---|
| Leirvíkar | 8.000 |
| Gøtu | 1.500 |
| Eiðis | 2.400 |
| Vestmanna | 8.000 |
| Sands | 5.500 |
| Hvalbiar | 5.500 |
| | kr. 30.900 |

**§2.** Ásetingarnar í §§3, 4 og 5 í løgtingslóg nr. 44 frá 23. juni 1978 eru eisini galdandi fyri byggingar, framdar við studningi sambært hesi løgtingslóg.

**§3.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

### lagtingslov om tillægsbevilling til visse havneudvidelser

**§1.** Som tillæg til de bevillinger, derved lagtingslov nr. 44 af 23. juni 1978: Lagtingslov om 6 års plan for udbygning af havnene, blev ydet til udvidelse af havnene i nedennævnte kommuner, ydes der af landskassen tilskud svarende til 75% af det beløb, anlægsudgifterne for pågældende havneudvidelse overstiger den i ovennævnte lagtingslov anførte maksimale tilskudsberettigede byggesum, dog højst 75% af nedenfor anførte beløb.

Tilskudet udbetales med en trediedel i hvert af finansårene 1984/85, 1985/86 og 1986/87:

| *Kommune* | kr. |
|---|---|
| Leirvíkar | 8.000 |
| Gøtu | 1.500 |
| Eiðis | 2.400 |
| Vestmanna | 8.000 |
| Sands | 5.500 |
| Hvalbiar | 5.500 |
| | kr. 30.900 |

**§2.** Bestemmelserne i §§3, 4 og 5 i lagtingslov nr. 44 af 23. juni 1978 er også gældende for anlæg udført med tilskud i henhold til denne lagtingslov.

**§3.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Játtanirnar undir teim havnaætlanum, gjørdar eru síðan byrjanina av seinasta heimsbardaga, eru vanliga bygdar á byggiætlanir, sum eru heilt leysliga lýstar og kostnaðarmettar. 6 ára ætlanin 1978/83 er einki undantak; men har var so roynt við indeksregulering at kunna taka prís- og lønarvøksturin uttan eykajáttanir.

Tær byggingar, sum farið er undir, ella sum framdar eru, eru tí í nógvum førum øðrvísi, større ella væl dýrari enn tær, sum upprunaliga vóru havdar í huga. Hetta kann hava ymiskar grundir; eitt nú at bygdaráðið, ið skuldi taka støðu til, hvat játtanin skuldi brúkast til, ikki er tað sama, sum sat, tá ið havnaætlanin var gjørd, ella at fiskivinnan í bygdini hevur verið fyri broyting, ella at byggingin av aðrari orsøk er vorðin kostnaðarmiklari, enn mett var um.

Niðanfyri er so sagt frá, hvør høvuðsorsøkin er til eykajáttanina til ta einkultu kommununa:

*Leirvíkar kommuna*
Undir 6 ára havnaætlanini 1978/83 varð Leirvíkar kommunu veittur studningur, stórur 50% av 5 mió.kr.; men higartil er einki brúkt av hesum.

Nú tunnilgerðin millum Leirvík og Gøtu er farin í gerð, er nattúrligast og høgligast at brúka grótið til øking um havnina í Leirvík.

Í Leirvík er ein havnarhylur, sum bæði er ferju- og fiskivinnuhavn; har er trongligt at sigla inn hjá tí nýggju stóru ferjuni og trongligt at manøvrera, so ynskiligt er at fáa annað pláss til ferjuna, eisini fyri at bøta um korini hjá fiskivinnuni.

Her kann verða viðmerkt, at Tryggingarsambandið hevur sent kommununi og Strandferðsluni bræv, har sagt verður, at Ternan er fyri so nógvum skaðum, at um ikki havnaviðurskiftini verða broytt, verður serlig trygging at gera fyri hana.

Roynt er at finna fram til bygging, sum gevur eina rúmligari havn beinanvegin og samstundis ber í sær møguleikar, sum frá líður, og vaksandi tørvur ger tað neyðugt, at kunna gera nýggjan havnarhyl norðan fyri hann, ið er.

Nú er Leirvík brimpláss, sum krevur verju fyri aldum bæði frá landsynningi og útnyrðingi, og hartil dýpist skjótt, so tað skal fáast stór rúgva av stórum gróti til vega til verju móti briminum, og hetta kostar nógv; serliga tí hetta grót má fáast aðrastaðni frá.

Vit skulu tí mæla til, at undir hesi uppískoytisjáttan verður eisini

veittur Leirvík ein hóskandi stuðul. Vit hava skotið upp 8 mió. kr.

*Gøtu kommuna*
Havnabyggingin er nú liðug. Uppgerðin vísir, at 1,5 mió. kr. resta í.

*Eiðis kommuna*
Havnabyggingin er liðug, og vísir uppgerðin, at 2,4 mió. kr. resta í.

*Vestmanna kommuna*
Fyri at fáa lívd fyri lágættini er ætlanin at leggja eitt grótkast út frá Grønanesi; hetta var við í upprunaætlanini, men varð tikið burtur úr aftur, tí játtanin rakk ikki so langt. Kostnaðurin er mettur at verða o.u. 3,0 mió.kr. Eisini er ætlanin at flyta ferjuleguna inn á Fitjarnar ella Fjørð. Hetta vildi bøtt munandi um plássviðurskiftini á Heyganesi bæði hjá virkjunum og skipunum. Eisini vildi ferðslan ígjøgnum bygdina minkað munandi. Kostnaðurin verður mettur at verða 5,0 mió.kr.

Av tí at einki avlop verður frá havnabyggingini, ið nú fer fram, verður neyðugt við eykajáttan stórari 8,0 mió.kr.

*Sands kommuna*
Brimgarðurin er liðugur, og bryggjubyggingin er um at vera fullgjørd. Metingar um, hvat arbeiðið tilsamans kemur at kosta, vísa, at o.u. 5,5 mió.kr. fara at resta í.

*Hvalbiar kommuna*
Havnabyggingin var liðug fyri tveimum árum síðani, og nýtt fiskavirki verður tikið í nýtslu um stutta tíð.

Ynski eru um at leingja tann gamla pierin út til grótkastið, ið gongur vestureftir. Umframt at økja um bryggjusíðuna hevði henda útbygging gjørt tað møguligt at komið lættliga til alt grótkastið við amboðum, ið neyðug eru at nýta, um ábøtur skuldu gjørst neyðugar.

Mett verður, at kostnaðurin av framman fyri tilskilaðu byggiug og tann peningur, sum restar í tað, sum framt er, tilsamans verða o.u. 5,5 mió. kr.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 12. apríl beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin sendi landsstýrinum málið tann 13. mai s.á. við áheitan um at viðgera málið alt fyri eitt og avgreiða tað aftur til fíggjarnevndina.

Landsstýrið viðgjørdi málið á fundi tann 20. mai 1983, og varð samtykt at gera hesar broytingar í skrivi landsstýrisins frá 25. mars 1983:

Leirvíkar ..... 4.000
í staðin fyri 8.000
Vestmanna ..... 3.000
í staðin fyri 8.000

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 25. mai 1983 og hevur býtt seg í 6 minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Svend Åge Ellefsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við teirri broyting, sum tilskilað er í skrivi landsstýrisins frá 24. mai 1983, soleiðis at talið fyri Lorvík verður lækkað frá 8 til 4 mió.kr. og Vestmanna verður lækkað frá 8 mió.kr. til 3 mió.kr.

Nevndi minniluti tilskilar, at hesar 3 mió.kr. verða at nýta til grótkast á Grønanesi.

Sostatt setir nevndi minniluti (Ivan Johannesen og Svend Åge Ellefsen) fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**

upprunauppskot landsstýrisins.

| | |
|---|---|
| Í §1 verður upphæddin fyri Lorvíkar kommunu broytt frá 8 mió.kr. til 4 mió.kr. og upphæddin fyri Vestmanna kommunu broytt frá 8 mió.kr. til 3 mió.kr. Sostatt verður samanteljingin lækkað við kr. 9 mió. úr kr. 30,9 mió. til kr. 21,9 mió. | I §1 ændres beløbet for Lorvíkar kommune fra 8 mio.kr. til 4 mio.kr. og beløbet for Vestmanna kommune fra 8 mio. kr. til 3 mio.kr. Følgelig formindskes sammentællingen med 9 mill.kr. fra 30,9 mill.kr. til 21,9 mill.kr. |

Minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) kann ikki taka undir við tí broyting frá landstýrinum, har tann upphæddin (5 mió.kr.), sum varð ætlað til flyting av ferguleguni í Vestmanna, verður strikað. Vísandi til skriv frá Vestmanna kommunu, har dentur verður lagdur á tað neyðuga í, at fergulegan verður flutt sum skjótast, kann ikki góðtakast, at framtíðarætlanir viðvíkjandi fergu í sambandinum um Vestmannasund føra tað við sær, at hetta neyðuga tiltak enn eina ferð verður útsett.

Í fíggjarlógini í fjør var samtykt eftir áheitan frá einari samdari fíggjarnevnd ein upphædd til flytan av hesi somu fergulegu inn á Fjørð.

Men tá Landsverkfrøðingurin og Vestmanna kommuna ikki kundu semjast um, í hvønn mun kommunan skuldi vera við í hesari fígging, varð hetta arbeiðið ikki gjørt tá. Men nú er so semja gjørd hesum viðvíkjandi, og tí samdist landsstýrið um at seta 5 mió.kr. av til hetta arbeiði, sum eisini er eitt lið í komandi ídnaðarútbygging og bátahyl inni á Fjørð.

Tá havnarviðurskiftini í Lorvík eru vánalig, er umráðandi, at tað grót, sum kemur frá bergholsgerðini har, kemur eini møguligari komandi útbygging har tilgóðar.

Tá 4 mió.kr. aftrat teimum 5 mió.kr., sum Lorvíkar kommuna eigur til góðar á núverandi 6 ára havnaætlan, sambært upplýsingar koma at røkka til pakking av tunnilsgrótinum, kann takast undir við hesari broyting frá landsstýrinum.

Sambært omanfyri nevnda setir minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í §1 verður upphæddin fyri Lorvíkar kommunu broytt frá 8 mió.kr. til 4 mió.kr. Sostatt verður samanteljingin minkað við 4 mió.kr. úr 30,9 mió.kr. til 26,9 mió.kr. | I §1 ændres beløbet for Lorvíkar kommune fra 8 mio.kr. til 4 mio.kr. Følgelig formindskes sammentællingen med 4 mill.kr. fra 30,9 mill.kr. til 26,9 mill.kr. |

Minnilutin (Hilmar Kass) tekur undir við upprunauppskoti landsstýrisins so sum broytt við skrivi landsstýrisins frá 20. mai 1983 við teirri broyting, at studningurin ikki verður 75%, men 50% av teimum í broytta uppskotinum tilskilaðu upphæddunum. Nevndi

minniluti setir sostatt fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til**

uppskot landsstýrisins:

Í §1 verður »75%«, har tað er nevnt, broytt til »50%« og upphæddin fyri Lorvíkar kommunu broytt frá 8 mió.kr. til 4 mió. kr. og Vestmanna frá 8 mió.kr. til 3 mió.kr. Sostatt verður samanteljingin minkað við 9 mió.kr. úr 30,9 mió.kr. til 21,9 mió.kr.

I §1 ændres »75%«, hvor det er nævnt, til »50%«, og beløbet for Lorvíkar kommune ændres fra 8 mill.kr. til 4 mill.kr. og Vestmanna fra 8 mill.kr. til 3 mill.kr. Følgelig ændres sammentællingen med 9 mill.kr. fra 30,9 mill.kr. til 21,9 mill.kr.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur undir við upprunauppskoti landsstýrisins, tó at upphæddin fyri Lorvíkar kommunu verður broytt frá 8 mió.kr. til 4 mió.kr. og setir sostatt fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til**

uppskot landsstýrisins:

Í §1 verður upphæddin fyri Lorvíkar kommunu broytt frá 8 mió.kr. til 4 mió.kr. Sostatt verður samanteljingin minkað við 4 mió.kr. úr 30,9 mió.kr. til 26,9 mió.kr.

I §1 ændres beløbet for Lorvíkar kommune fra 8 mill.kr. til 4 mill kr. Følgelig formindskes sammentællingen med 4 mill.kr. fra 30,9 mill.kr. til 26,9 mill.kr.

Minnilutin (Atli P. Dam) átalar, at peningurin longu er brúktur, og at tað er ov seint, at landsstýrið nú útvegar sær lógarheimild, og at nevndi minniluti tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, legði 1. juni 1983 fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Minnilutin (tjóðveldisflokkurin) mælir til at samtykkja upprunauppskotið frá landsstýrinum frá 25.3.1983 óbroytt.

2. viðgerð 1. juni. Atkvøðugreiðsla á seinni fundi sama dag. Uppskot landsstýrisins §§1-2 samtyktar við 26 atkvøðum fyri, og 6 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Juul Jacobsen, Asved Djurhuus, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Ernst Hansen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrið Sondum, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Atkvøddu ikki: Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Svend Åge Ellefsen, Ivan Johannesen, Pauli Ellefsen.

§3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu og at fara til 3. viðgerð samtykt við 28-0. Broytingaruppskot frá minniluta í fíggjarnevndini (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen) til §1 fall við 9-0, broytingaruppskot frá Hilmar Kass fall við 3-0, og broytingaruppskot frá minniluta (Øssur Dam Jacobsen) fall við 12-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Loyvi at frávíkja tíðarfreistina varð givið. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 64 frá 23. juni 1983

---

# 102. Skúlalæknaskipan

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til, at hjálagda uppskot til »Anordning om ændring af anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning« verður sett í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Skúlalæknarnir í Havn hava vent sær til landsstýrið og ríkismyndugleikarnar og hava gjørt vart við, at sambært §1 í núgaldandi lóg skulu skúlalæknin og skúlaheilsusjúkrasystrar »foretage forebyggende helbredsundersøgelse af alle børn i den undervisningspligtige alder«, og at børn í 8., 9. og 10. flokki sostatt verða slept upp á fjall. Børnini í hesum trimum flokkum hava eftir meting skúlalæknans og skúlasjúkrasystranna ein stóran tørv fyri virkiskanningum, samrøðum og vegleiðingum.

Ríkisumboðsmaðurin hevur gjørt hjálagda uppskot. Viðvíkjandi uppskotinum verður annars víst til hjáløgdu viðmerkingar ríkisumboðsmansins.

RIGSOMBUDSMANDEN PÅ FÆRØERNE
J.nr. 30-10-17/1982
Den 8. februar 1983

UDKAST
til
*Anordning om ændring af anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning*

Vi Margrethe den Anden, af Guds nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I henhold til §10 i lov om skolelægeordning, jfr. lovbekendtgørelse nr. 430 af 16. august 1974, bestemmes:

§1.

I anordning nr. 16 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning foretages følgende ændringer:

1. §1 affattes således:

»Ved enhver skole skal der ved skolelæge foretages forebyggende helbredsundersøgelser af alle børn i 1.-9. klasse og i børnehaveklasser samt føres kontrol med sundhedstilstanden i skolerne.

Stk. 2. Efter Færøernes Landsstyres bestemmelse kan der tilbydes skolebørn over 9. klasse forebyggende helbredsundersøgelser.

§2.

Nærværende anordning træder i kraft den 1. august 1983.

Givet på Amalienborg, den 1983

Under Vor Kongelige Hånd og Segl

Margrethe R

/Britta Schall Holberg

RIGSOMBUDSMANDEN
PÅ FÆRØERNE
J.nr. 30-10-17/1982
Den 8. februar 1982

*Bemærkninger*
*til*
*udkast til anordning om ændring af anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning*

*Ad anordningsudkastets § 1, nr. 1.*
I henhold til § 1, stk. 1, i anordning nr. 16 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning, jfr. § 1, stk. 1, i indenrigsministeriets bekendtgørelse nr. 31 af 28. januar 1981 om skolelægeordning på Færøerne, omfatter skolelægeordningen på Færøerne alle børn i børnehaveklasser og i den undervisningspligtige alder. Den undervisningspligtige alder på Færøerne svarer for tiden til folkeskolens 1.-7. klasse, jfr. lov for Færøerne nr. 51 af 14. februar 1979 om folkeskolen paragrafferne 3 og 7, jfr. lagtingslov nr. 21 af 22. marts 1979 om folkeskolen § 43.

Efter den før ikrafttræden af anordning nr. 16 af 16. januar 1981 gældende skolelægeordning (jfr. lov for Færøerne nr. 140 af 31. marts 1960 om skolelæger, som ændret ved lov nr. 168 af 11. maj 1966 om ændringer i lov for Færøerne om skolelæger) var børn i 1.-10 skoleår samt elever ved gymnasieskolen omfattet af skolelægeordningen.

Selvom undervisningspligten på Færøerne kun omfatter til og med 7. klasse, er det i de senere år blevet stadig mere almindeligt, at eleverne fortsætter i folkeskolens højere klasser. På grundlag af oplysninger om fødselsårgangenes størrelse i 1966 til 1968 og om antallet af elever i folkeskolens 8.-10. klasse i skoleåret 1982/83 må det således skønnes, at ca. 97% af eleverne i dag fortsætter i 8. klasse, ca. 91% fortsætter i 9. klasse og ca. 69% fortsætter i 10. klasse. Samlet må skønnes, at ca. 89% af de unge i aldersgruppen 15-16 år går i 8.-9. klasse, og at ca. 85% af de unge i aldersgruppen 15-17 år går i 8.-10. klasse.

Forskellige skolelæger og skolesundhedsplejersker har oplyst, at erfaringerne inden for skolesundhedsplejen på Færøerne viser, at særligt eleverne i 8.-10. klasse har brug for behovsundersøgelser.

På denne baggrund synes der ikke længere at være nogen væsentlig begrundelse for, at skolelægeordningen på Færøerne ikke

— som skolelægeordningen i Danmark — omfatter mindst til og med 9. klasse, jfr. §1 i bekendtgørelse nr. 430 af 16. august 1974 af lov om skolelægeordning.

Skolelægerne på Færøerne er alle ansat på samme vilkår, og deres distrikter består for øjeblikket af fra 2 til 8 kommuner. Skolesundheds/skolesygeplejerskerne er ligeledes ansat på samme vilkår, og deres distrikter indeholder for øjeblikket fra 3 til 8 kommuner.

Endvidere er det almindeligt, at elever i de højere klasser går i skoler, hvortil der kommer elever fra flere kommuner.

Da det således er afgørende, at skolelægeordningen over hele Færøerne omfatter de samme klasser, og da der skønnes at være et væsentligt behov for, at skolelægeordningen omfatter 8.-9. klasse, er anordningen foreslået ændret, således at børn i børnehaveklasser og 1.-9. klasse bliver omfattet af skolelægeordningen.

Formuleringen i den foreslåede nye §1, stk. 1 omfatter de samme skoler, som er omfattet af den nuværende skolelægeanordnings §1, d.v.s. kommunale folkeskoler og private skoler, hvor der meddeles en tilsvarende undervisning.

Da afgørende praktiske hensyn, jfr. ovenfor, taler for, at skolelægeordningen overalt på Færøerne omfatter de samme klasser, og da skolelægeordningen på Færøerne — modsat i Danmark — ikke administreres af kommunerne, foreslås reglen i §1, stk. 2, i anordning nr. 16 af 16/1 1981 erstattet af en regel om, at skolelægeordningen efter Færøernes Landsstyres bestemmelse kan bringes til at omfatte skolebørn over 9. klasse (d.v.s. unge i 10. klasse).

Den foreslåede ændring skønnes ikke at ville medføre merudgifter til skolelægeordningen, idet der samtidig forventes gennemført visse omlægninger i skolelægeordningen (bl.a. reduktion af antallet af rutineundersøgelser udført af skolelægen). Der skønnes heller ikke at blive tale om merudgifter til skolesundhedsplejerskeordningen.

*Ad anordningsudkastets §2.*

Væsentlige praktiske hensyn tilsiger, at nye regler vedrørende skolelægeordningen på Færøerne sættes i kraft fra et skoleårs begyndelse, d.v.s. pr. 1. august.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 12. aprfl 1983 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið snýr seg um, at skúlalæknaskipanin umframt undirvísingarskyldugan aldur eisini kemur at umfata barnagarðsflokkar og 8. og 9. flokk. Harafturat skal landsstýrið kunna bjóða skúlanæmingunum eldri enn úr 9. flokki fyribyrgjandi heilsukanningar.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2126-1

# 103. Setan av 6-manna nevnd at viðgera málið um, hvørji sjónarmið, ið skulu leggjast til grund fyri útbyggingini av sjúkrahúsverkinum

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til samtyktar**

Løgtingið setir niður eina 6-manna nevnd við einum limi úr hvørjum tingflokki at viðgera málið um hvørji sjónarmið, ið skulu leggjast til grund fyri útbyggingini av sjúkrahúsverkinum.

**Viðmerkingar:**

Viðvíkjandi álitinum frá ráðleggingarnevndini. Í málinum fyriliggur:

1. Álit viðvíkjandi útbygging av sjúkrahúsverkinum í Føroyum, greitt úr hondum av einum meiriluta í ráðleggingarnevndini tann 1. august 1980.
2. Minnilutaálit frá Johan Simonsen, sála.
3. Ummæli frá landslæknanum dagfest 15. januar 1981.
4. Skriv frá heilsustýrinum dagfest 8. februar 1982.

Grundarlagið hjá ráðleggingarnevndini er §2, 5. petti í sjúkrahúslógini.

Grundarlagið fyri álitinum er: Rundskriv frá innanríkismálaráðnum nr. 103, dagfest 8. juni 1971 »vejledende retningslinier for planlægning af sygehusvæsenets fremtidige udbygning« og rundskriv nr. 86, dagfest 4. apríl 1977 »vejledende retningslinier for planlægning af psykiatrisk sygehusvæsen« og rundskriv nr. 245, dagfest 20. december 1978 »om ændrede tidsfrister m.v. for indsendelse af sygehusplaner«.

Harafturat er í arbeiðinum nýtt álit frá læknaráðnum á Landssjúkrahúsinum um sjúkrahúsútbygging í Føroyum, og frá sjúkrasystraráðnum álit um sjúkrasystrar og sjúkrarøkt á føroysku sjúkrahúsunum. Afturat hesum er til arbeiðið í sambandi við álitið gjørd ein prognosa yvir fólkatalið fram til 1992.

Harafturat eru settar fyritreytir viðvíkjandi ellis- og røktarheimum og andveikraverndini.

*Ad 1.* Málsetningurin hjá nevndini var:

»Ráðleggingarnevndin hevur ta støðu, at sjúkrahúsverkið í Føroyum skal útbyggjast, so tað verður ført fyri at lúka tey krøv, sum eru tilskilað í teimum fyrr nevndu veglciðandi stevnumiðum, sum innanríkisráðið hevur sent út viðvíkjandi tilrættalegging av framtíðar útbygging av sjúkrahúsverkinum og framtíðar útbygging av psykiatriska sjúkrahúsverkinum. Harafturímóti hevur ráðleggingarnevndin ikki mett tað sum sína uppgávu at seta fram uppskot um eina veruliga rationalisering av arbeiðsgongdini á sjúkrahúsunum. Nevndin heldur seg ikki hava teir neyðugu forkunnleikarnar til at loysa eina slíka uppgávu.« (bls. 14)

Meirilutin førdi víðari fram:

»Ráðleggingarnevndin hevur ta fatan, at Landssjúkrahúsið bjóðar eina fjøltáttaða serviðgerð av teimum sjúklingum frá øllum landinum, sum hava brúk fyri tí, og at tað samstundis virkar sum eitt vanligt sjúkrahús fyri sítt øki.

Klaksvíkar og Suðuroyar Sjúkrahús virka sum lokalsjúkrahús fyri síni øki og bjóða sum slík almenna kirurgiska og medicinska viðgerð, smb. §5, 2. stk. í sjúkrahúslógini. Hóast ein ávísan vanda fyri einum ógagnligum arbeiðsbýti samtykkir ráðleggingarnevndin í, at kirurgisk og medicinsk serviðgerð í ein vissan mun verður løgd út til sjúkrahúsini í Klaksvík og Suðuroy. Nevndin heldur, at fyri at kunna bjóða einum yvirlækna nóg mikið og nóg kvalificerað arbeiði er tað neyðugt at leggja serviðgerð innan fyri ávís øki av sjúklingum frá øllum landinum til lokalsjúkrahúsini. Nevndin hevur í hesum sambandi havt tær broytingar í huga, sum hava verið

í útbúgvingini av serlæknum, serstakliga viðvíkjandi skurðviðgerð. Tað má tó ikki føra við sær ov stórar íløgur í føstum og óflytiligum útbúnaði, at serviðgerð verður løgd út til lokalsjúkrahúsini (bls. 15-16).

Viðvíkjandi útbyggingini í framtíðini førir meirilutin í høvuðsheitinum fram:

Undirnevndirnar hava í sínum frágreiðingum reist ymiskar principiellar spurningar. Ráðleggingarnevndin hevur tí mett tað natúrligt fyrst at taka støðu til hesar spurningar, sum viðvíkja býtinum av viðgerðaruppgávuni millum landssjúkrahúsið og tey bæði lokalsjúkrahúsini, herundir eitt uppskot um broyting av §5, 2. stk. í lóg nr. 621 frá 22. december 1976, og um spurningin um upptøkuøkini hjá sjúkrahúsunum.

Hóast áskoðanina í 1. kapitli (málsetningurin) loyvir ráðleggingarnevndin sær at vísa á, at við at lúka treytirnar í §5, 2. stk. í sjúkrahúslógini verður vandi fyri einum óhóskandi býti av viðgerðarmøguleikunum og harvið eini verri tænastu fyri avvarðandi sjúklingar, enn ein útbygging av medicinsku deildini á Landssjúkrahúsinum hevði givið møguleikar fyri. Undirnevndin viðvíkjandi medicini, pædiatri og langtíðarviðgerð førir fram, at tað við einum íbúgvaragrundarlagi uppá 45.-50.000 fólk og við einari so góðari samferðslu, sum vit hava í dag, er nóg mikið og eisini hóskandi við einari medicinskari deild í Føroyum. Tað, sum talar fyri einari centralisering av tí medicinska virkseminum, er:

1. Subspecialisering innan fyri medicin ger, at tað verður ógvuliga ringt í dag at fáa til vega ein medicinskan serlækna við nóg breiðari almennari útbúgving til lokalsjúkrahúsini.
2. Spjaðing av teimum medicinsku sjúklingunum á tríggjar deildir minkar um útbúgvingarvirðið fyri læknar og sjúkrasystrar hjá deildini (heiliráðdeildin á Landssjúkrahúsinum).
3. Tað krevjast so nógv og dýr tól til kanningar av sjúklingum við medicinskum sjúkum í dag, at talan kann bert vera um at seta slík tól upp á einum sjúkrahúsi. (Ultraljóð, endoskopi, CT-scanning, isotopkanningarútstýr).

Ráðleggingarnevndin kann taka undir við hesari áskoðan, og út frá ynskinum um at bjóða íbúgvunum eina effektiva og serkøna viðgerð á hesum økjum heldur nevndin, at tann medicinska serviðgerðin eigur at verða savnað á Landssjúkrahúsinum. Samstundis leggur nevndin tó dent á, at tann medicinska konsulenttænastan á lokalsjúkrahúsunum

verður útbygd, eins og møguleikarnir hjá lokalsjúkrahúsunum verða víðkaðir at gera ambulantar fyribilskanningar av medicinskum sjúklingum. Út frá hesum fer ráðleggingarnevndin at biðja avvarðandi myndugleikar umhugsa, at teir við komandi gjøgnumgongd og møguligari endurskoðan av sjúkrahúslógini umhugsa eina broyting í orðalagnum í § 5, 2. stk. t.d. soleiðis, at fyriskipanin fær hetta orðalag:

Við hvørt sjúkrahús verða settir í minsta lagi 2 yvirlæknar.

Hóast hesa prinsippstøðu hevur ráðleggingarnevndin, smb. viðmerkingar til kap. 1, gjørt alternativ uppskot, lagað eftir galdandi reglum.

Sum nevnt í 1. kapitli er tað áskoðanin hjá ráðleggingarnevndini, at fyri at kunna bjóða einum yvirlækna nóg mikið og nóg kvalificerað arbeiði, er neyðugt at leggja serviðgerð innan fyri ávís øki av sjúklingum frá øllum landinum til lokalsjúkrahúsini. Nevndin samtykkir tí í, at tann ortopædkirurgiska viðgerðin av sjúklingum frá øllum landinum fyribils verður gjørd av yvirlæknanum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hinvegin heldur nevndin, at tað ikki má føra við sær ov stórar fløgur í føstum og óflytiligum útbúnaði, at serviðgerð verður løgd út til lokalsjúkrahúsini. Nevndin heldur tí, at í løtuni er ikki orsøk at broyta verandi skipan á tí ortopædkirurgiska økinum øðrvísi enn, at tann ortopædkirurgiska konsulenttænastan á Landssjúkrahúsinum verður víðkað. Harafturímóti kann nevndin ikki taka undir við, at skurðviðgerðarstovan við »yvirtrykki«, sum verður hildin at vera neyðug til viðgerð av ortopædkirurgiskum sjúklingum, verður gjørd aðra staðni enn á Landssjúkrahúsinum.

Undirnevndin viðvíkjandi lokalsjúkrahúsinum hevur viðgjørt upptøkuøkini hjá lokalsjúkrahúsunum. Einki uppskot var sett fram um broyting av upptøkuøkinum hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi. Ein minniluti hevur sett uppskot fram um at broyta upptøkuøkið hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi til í framtíðini bert at fevna um Norðoyggjar. Ein annar minniluti heldur fast við núverandi upptøkuøki, sum fevnir um Norðoyggjar, Fuglafjørð, Gøtu og Leirvíkar kommunur. Ein triði minniluti tekur ikki støðu til spurningin.

Ráðleggingarnevndin heldur, at tað eigur at verða umhugsað at broyta upptøkuøkið hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, tá hugsað verður um fólkavøksturin og serstakliga broytingina í samferðsluni oyggjanna millum. Broytingin í samferðsluni ger, at frá ávísum kommunum er lítil og eingin munur á at flyta sjúklingarnar til Havnar ella Klaksvíkar. Nevndin heldur tí, at tann meira fjøltáttaða viðgerðin, sum landssjúkrahúsið kann bjóða sjúklingunum, má telja við, og tí mælir nevndin til, at avvarðandi kommunur verða bidnar um eitt ummæli.«

(bls. 57-58)

*Ad. 2* Í minnilutaálitinum verður m.a. ført fram:

»Tað er rímiligt at byrja við at vísa á, at orsøkin til, at ráðleggingarnevndin er sett, er løgtingsavgerð frá 9. apríl 1976 (løgtingsmál nr. 72/1975).

Sambært hesa lóg er frá føroyskari politiskari síðu í høvuðsheitum tikin støða til skipanina av tí føroyska sjúkrahúsverkinum, við tað at lóggávuvaldið hevur lagt og uppteknað tað støði, sum allar nevndirnar skulu byggja síni ummæli á.

Øll onnur hugsan um nevndararbeiði er ynskihugsan, sum ikki kann sameinasta við objektivt arbeiði, fyri ikki beinleiðis at ogna sær kompetence og evna tær til í fjaldum ætlanum fyri at fáa eitt úrslit, har uppaftur eitt burekratiskt sigursmerki verður vundið á stong, demokratinum til skaða, og við beinleiðis misáliti á lóggávumyndugleikarnar sum avleiðing.« (bls. 65)

Um ta ynskiligu skipan av sjúkrahúsverkinum verður m.a. ført fram:

»Føroyska sjúkrahúsverkið skal og eigur tí at útbyggjast samsvarandi verandi sjúkrahúslóg.

Viðvíkjandi Tórshavnar sjúkrahúsi eiga sett yvirlæknastørv at fastlæsast.

Heldur átti ein decentralisering at farið fram til frama fyri lokalsjúkrahúsini (bls. 66)

Tað krevst ein minni útbygging av sjúkrahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri, ikki bert fyri at nøkta verandi tørv fyri umleið 50 seingjaplássum, men eisini tí at núverandi støða má roknast sum heilt órímilig á einum arbeiðsplássi, har trygdin eigur at vera avgerandi.« (bls. 66-67)

Aftaná at hava viðgjørt sjúkrahúsini í Íslandi verður framhaldandi ført fram:

»Við tí mynstri, ið her er uppteknað, er vert at kanna, um ein slíkur sjúkrahússtovnur átti at verðið lagdur í Eysturoynni.

Hesin stovnur vildi í so máta havt góðar samarbeiðsmøguleikar, hvat viðvíkur serlæknar, bæði við sjúkrahús í Norðyggjum og í Havn.« (bls. 67)

Um útbúgving, decentralisering, búskap og konsulenttænastu varð m.a. ført fram:

»Sum tað skilst hevur minnilutin ta fatan, at órímiliga nógv eigur ikki at stovnast og ofrast til útbúgving, grundað á teir avmarkaðu møguleikarnar, sum eru við einum so lítlum fólkatali sum 45.000

íbúgvum, tá tað vanliga verður roknað við minimum 250.000 sæð út frá útbúgvingarsjónarmiði, og eisini út frá teimum avmarkaðu fíggjarligu møguleikunum, sum eru til taks.

Núverandi útbúgvingarháttur má fasthaldast, og skiftandi ávirkan á sjúkrahúsunum má roknast sum nakað positivt, fyri at nýta orðalagið hjá tí yngra læknanum.

Tað sama er galdandi viðvíkjandi sjúkrasystraútbúgvingini.

Tá minnilutin setir seg ímóti at miðsavna sjúkrahúsverkið hjá okkum, meira enn tað er, er tað út frá ringum royndum og tí misskiljing, sum liggur í, at ein so umráðandi stovnur savnar á einum staði 1000 fólk í arbeiði av einum fólkatali uppá gott 40.000 (ella uml. 3% av øllum íbúgvarunum), og hesi verða sjálvandi tikin frá tí produktiva sektorinum úti um oyggjarnar.« (bls. 67-68)

At enda verður ført fram: »At enda er vert at leggja aftrat, at minstu krøvini mugu vera §14-kvalificeraðir yvirlæknar á øllum sjúkrahúsunum.

Sambært ummæli frá landslæknanum eiga eftirútbúgvingarmøguleikar sum subspecialistar at vera til staðar fyri at kunna manna tey sokallaðu lokalsjúkrahúsini við tí ekspertisu, sum tey hava krav uppá, um vit skulu varðveita bæði álitið og tryggleikan og møguleikarnar at fáa tað úrslit innan heilsusektorin, sum vit yuskja.« (bls. 68)

*Ad 3.* Landslæknin førir í innganginum í tilmæli sínum m.a. fram:

»Sjúkrahúsverkið er ein partur av samlaða heilsuverkinum, og er tað tí eftir mínum tykki mest rímiligt at viðgera sjúkrahúsverkið við støðugum atliti til heilsuverkið sum heild.« (bls. 1-2)

»Vit mugu tí eftir mínum tykki steðga eitt sindur á og spyrja okkum sjálvi, um rætta leiðin at ganga til tess at bøta um heilsustandin er framhaldandi at vaksa um sjúkrahúsútreiðslurnar.

Dentur má eisini — í nógv størri mun enn higartil — verða lagdur á at mótvirka teimum orsøkum, ið finnast í samfelagi okkara, sum elva til vælferðarsjúkurnar, soleiðis at fingin verður til vega ein betri javnvág millum okkum menniskju og umhvørvið. Í hesum sambandi verður viðv. umhvørvi serliga hugsað um luftina, vit anda, ferðsluháttur okkara, matin vit eta, støða okkara í mun til familju og arbeiði okkara. Í hesum — ið onkur kanska vil halda - - einfaldu setningum eru eftir mínari meting orsøkin til flestu sjúku- og deyðatilburðir í samfelag okkara í dag. Fingu vit til vega eitt gott umhvørvi í mun til tað, ið vit nú hava, vildi hetta óivað í stóran mun minkað um teir nógvu tilburðir av hjarta- og æðrasjúku, krabbameini, ferðsluvanlukku og sálarligum sjúkum. Hesar sjúkur eru sum nevnt tær altvaldandi í samfelag okkara í dag.

Heilsuverkið er í stóran mun hjálparleyst, tá talan er um at grøða hesar vælferðarsjúkur, eru tær fyrst komnar.

Rætta leiðin í hesum stóra vandamáli er eftir mínum besta tykki ikki at økja stórvegis um sjúkrahúsútreiðslurnar, tí hetta fer ikki at geva nakran avgerandi bata longur.

Heldur mugu vit nú í nógv størri mun enn higartil økja um og leggja til rættis landsumfatandi, áhaldandi fyribyrgjandi virkseini.« (bls. 4-5)

Í niðurstøðuni í tilmælinum hjá landslæknanum verður m.a. ført fram:

»Spurningar um útbygging av sjúkrahúsverkinum í Føroyum eiga at verða viðgjørdir við støðugum atliti til heilsuverk okkara sum heild.

Dentur eigur at verða lagdur á at økja munandi um fyribyrgjandi heilsuarbeiði.

Rundskrivið frá innanríkisráðnum, ið kom í 1971, má verða brúkt við varsemi sum grundarlag undir sjúkrahúsútbygging í dag, lutvíst tí tað hevur 10 ár á baki.

Fyritreytin fyri, at Sjúkrahúsverk Føroya skal fáast at virka sum best, er, at ein visitatiónsnevnd ger eitt gjølligt arbeiði, har greiðar og fastar visitatiónsreglur verða ásettar.« (bls. 31-32)

Landslæknin mælir serliga til, at:

»Sett verður ein visitatiónsnevnd skjótast gjørligt, ið m.a. skal gera fastar og greiðar reglur um visitatión av sjúklingum frá kommunulæknum til sjúkrahús, frá lokalsjúkrahúsum til Landssjúkrahúsið og frá sjúkrahúsunum í Føroyum til Danmarkar,

at munandi styrking av ambulatoriuvirkseminum á føroyskum sjúkrahúsum verður prioriterað frammarlaga,

at skundað verður mest møguligt undir bygging av røktarheimi (ella smáum røktarheimum) í Havn, so tann átroðkandi tørvurin á hesum verður nøktaður sum skjótast,

at pædiatriska sjúkrahústænastan í Føroyum verður útbygd, eisini hin ambulanta,« (bls. 32-33)

»spurningurin um, hvussu økta ambulanta sjúkrahúsvirksemið sum heild skal skipast, eigur at verða nágreiniliga lýstur,« (bls. 33)

»spurningurin um sjúklingar við langtíðarviðgerðartørvi á sjúkrahúsi verður nærri kannaður,

biðið verður um ummæli frá kommununum í Fuglafirði, Gøtu og Lorvík viðvíkjandi spurninginum, hvørt sjúkrahúsøki tær ynskja at liggja undir.« (bls. 33-34)

*Ad 4.* Niðurstøðan hjá heilsustýrinum er:

»Viðmerkjast skal, at heilsustýrið fyrst og fremst leggur dent á, at fyriliggjandi álit er eitt virðismikið grundarlag fyri at taka støðu til

hóskandi útbygging av føroyska sjúkrahúsverkinum. Av tí at gongdin innan fyri læknaliga økið er ógvuliga staðilig, og av tí at eisini aðrar fyritreytir, sum koma við í planleggingina fyri sjúkralhúsverkið, broytast, heldur heilsustýrið, at tað er umráðandi, at tað ráðleggingararbeiði, sum er byrjað við hesum áliti, heldur fram og menmist. Í hesum sambandi verður víst á, at tað er neyðugt við útbygging av systematiskari registrering av sjúklingaviðgerðunum á sama hátt, sum í løtuni verður gjørt í Danmark, um planleggingin av føroyska sjúkrahúsverkinum skal vera tíðarhóskandi.« (bls. 2)

»Út frá hesum tilfari heldur heilsustýrið ikki, at verandi seingjatal ikki er nóg mikið at nøkta tørvin av stationerari sjúkraviðgerð.« (bls. 2)

»Heilsustýrið kann taka undir við, at pædiatriska og langtíðarmedicinska virksemið verður styrkt, men heldur tó ikki, at ein slík styrking ger tað neyðugt at økja um seingjaplássini ella at gera nýggjar sjálvstøðugar deildir.« (bls. 2)

»Heilsustýrið kann viðmæla, at ambulatoriuvirksemið, her serstakliga forambulatoriuvirksemið, innan stórt sæð alla serviðgerð og øll sjúkrahús verður styrkt, og stýrið kann víðari viðmæla, at tær neyðugu útbyggingar, serstakliga á landssjúkrahúsinum, verða settar í gongd.« (bls. 2)

»Heilsustýrið kann sum heild viðmæla áskoðanini hjá meirilutanum viðvíkjandi virkseminum hjá lokalsjúkrahúsunum. Her skal viðmerkjast, at treytin fyri at varðveita eitt læknaliga ráðiligt viðgerðargrundarlag á landssjúkrahúsinum m.a. er, at landssjúkrahúsinum verður tryggjað eitt nóg stórt sjúklingagrundarlag. Somuleiðis verður víst á, at avgerandi treyt fyri, at framhaldandi útbúgving av læknum kann fara fram á landssjúkrahúsinum, er, at landssjúkrahúsinum verður tryggjað tað neyðuga sjúklingagrundarlagið.« (bls. 3)

»Hvat viðvíkur Suðuroyar Sjúkrahúsi eru eingi prógv fyri, at tørvur er á at víðka um seingjaplássini. Tað verður tí rátt til, at tann medicinska konsulenttænastan, sum er í dag, verður útbygd.« (bls. 3)

Hetta er hent, av tí at medicinskur yvirlækni úr Havn í dag kemur einaferð um vikuna á Suðuroyar sjúkrahús.

»Hvat viðvíkur Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur heilsustýrið tikið til eftirtektar, at har *er* settur ein yvirlækni í medicini. Heilsustýrið heldur seg tó framvegis til tær áður framførdu viðmerkingarnar viðvíkjandi tryggjan av sjúklingagrundarlagnum til landssjúkrahúsið og eisini til tær principiellu hugleiðingar viðvíkjandi virkisháttinum hjá lokalsjúkrahúsunum, sum Ráðleggingarnevndin hevur ført fram.

Heilsustýrið kann út frá hesum ikki viðmæla, at verandi seingjatal (26) á Klaksvíkar sjúkrahúsi verður víðkað munandi, men viðmælir uppskotið hjá ráðleggingarnevndini um, at neyðugar moderniseringar á Klaksvíkar sjúkrahúsi verða gjørdar.« (bls. 3)

»At enda verður ført fram, at ein avgerandi treyt fyri, at tað føroyska sjúkrahúsverkið kann virka best møguligt, er, at ein útbygging fer fram av samarbeiðnum millum ta primeru heilsutænastuna og sjúkrahúsverkið, og at samskipanin av sjúkrahúsverkinum verður styrkt. Stýrið skjýtur upp, at ein visitatiónsnevnd verður sett, sum skal seta rætningslinjur fyri visitatión av sjúklingum millum sjúkrahúsini og eisini av sjúklingum frá Føroyum til Danmarkar.« (bls. 3-4)

Læknaráðið á Landssjúkrahúsinum hevur í oktober 1982 latið álit til stýrið fyri Landssjúkrahúsið og Ráðleggingarnevndina fyri Sjúkrahúsverk Føroya.

Niðurstøðan í álitinum frá læknaráðnum á Landssjúkrahúsinum 1982 er soljóðandi:

Tørvur á nýbygging:

1. Nýggj barnadeild
2. Ambulatorium
3. Patologisk deild eigur at samlast á einum staði
4. Fleiri hølir til røntgendeildina
5. Langtíðarviðgerðardeild í staðin fyri uppihaldsdeildina.

Tørvur á nýggjum sergreinum (yvirlæknar):

Ortopædkirurgi
Barnasjúkur
Medisinskar nervasjúkur
Klinik kemi | í sambandi við arbeiðið
Mikrobiologi | á rannsóknarstovuni

Viðvíkjandi hjálparlæknum verður ført fram, at útbúgvingarmøguleikarnir eiga at styrkjast.

Harafturat eiga fleiri serlæknastørv innan verandi sergreinir at verða normerað.

Í sambandi við sjúkrahúsini í Klaksvík og á Tvøroyri verður ført fram, at allar undirgreinir eiga at vera á Landssjúkrahúsinum, og at uppgávurnar hjá teimum báðum sjúkrahúsunum eiga at verða:

1) Skaðastovuvirksemi
2) Viðgerð av kirurgiskum og gynækologiskum sjúkum
3) Viðgerð av øðrum akuttum sjúkum
4) Tænasta í sambandi við barnsburðar
5) Viðgerð av sjúklingum, ið aftaná stovnsetan av eini visitatións-

skipan verða sendir til sjúkrahúsið
6) Eftirviðgerð av sjúklingum frá upptøkuumráðnum aftaná innlegging á einum øðrum sjúkrahúsi
7) Fysioterapi
8) Rannsóknarvirksemi til upptøkuøkið

Upptøkuøkini eiga at verða ávikavist Norðoyggjar og Suðuroy.

Yvirlæknarnir í Klaksvík og Suðuroy hava í januar 1983 gjørt sínar viðmerkingar í ritið »Bemærkninger til og forslag om det færøske sygehusvæsen«.

Niðurstøðan í álitinum frá yvirlæknunum á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi 1. januar 1983 eru soljóðandi:

Upptøkuøkir:

Klaksvíkar sjúkrahús: Tá ið bergholið millum Gøtudal og Lorvík er liðugt, eigur Skálafjørður at verða lagdur aftrat.

Suðuroyar sjúkrahús: Um fast rutusamband verður millum Sand og Hvalba, eigur Sandoyggin at verða løgd aftrat.

Miðstaðarsjúkrahús fyri Føroyar er Ríkissjúkrahúsið.

Viðvíkjandi skipanini av arbeiðinum á sjúkrahúsunum eigur at verða miðað ímóti at minka ambulatoriivirksemið mest møguligt og at føra skaðastovuarbeiði heilt ella partvís aftur til kommunulæknarnar.

Uppgávur hjá sjúkrahúsunum:

Klaksvíkar sjúkrahús: Ortopædkirurgi og reumatologi fyri Føroyar og medisinskar og kirurgiskar tænastur fyri upptøkuøkið.

Suðuroyar sjúkrahús: Av tí at yvirlækni nr. 2 nýliga er settur, verður ikki tikin støða.

Tørvur á nýbygging:

Klaksvíkar sjúkrahús: 2. og 3. byggistig, t.v.s. um- og útbygging, soleiðis at seingjatalið verður u. 50. Harafturat ein nýggj skurðstova og fleiri høli til fysioterapi.

Suðuroyar sjúkrahús: Uppskotið um út- og umbygging frá 1979, soleiðis at seingjatalið verður 38. Harafturat betri móttøkuviðurskifti og fleiri høli til fysioterapi.

Tørvur á nýggjum størvum: Eitt yvirlæknastarv í kirurgi á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

At enda:: Av geografiskum orsøkum er neyðugt við ymsum serlæknafunktiónum á Landssjúkrahúsinum og herundir konsulenttænasta til hini sjúkrahúsini.
Desentralisering av uppgávum til tey minnu sjúkrahúsini fyri á tann hátt at varðveita skikkaðar læknar har. Yvirkapasitetur av seingjaplássum á Landssjúkrahúsinum.

Fíggjarnevnd Løgtingsins gjørdi í 1977 soljóðandi samtykt:

»Fíggjarnevndin mælir løgtinginum til at játta meirkostnað á § 12 til ein yvirlækna aftrat í almennari kirurgi.

Serviðgerð í ortopedi fer fram á og frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Mælt verður til eisini at játta meirkostnað í sambandi við setan av einum yvirlækna í patologi.«

Høvuðsspurningurin í málinum er eftir landsstýrisins metan, um sjúkrahúsverkið skal miðsavnast um Landssjúkrahúsið soleiðis, at Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahús bert eru hjálparsjúkrahús, ella um hesi 2 sjúkrahúsini skulu virka sjálvstøðugt við ávísum sergreinum tillagdar.«

Neyðugt er, at spurningurin um miðsavnan ella ikki er avgjørdur, áðrenn farið verður undir nýggjar útbyggingar. Síðani hetta er ein politiskur spurningur og knýttur at stórum fíggjarligum avleiðingum, metir landstýrið tað vera rætt, at løgtingið viðger spurningin og setir serstaka nevnd at koma við einum uppskoti.

Sí skjal 15 A-B

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 15. apríl. Valdir vórðu í nevndina: Petur Reinert, Jógvan Sundstein, Atli Dam, Agnar Nielsen, Adolf Hansen og Asbjørn Joensen.

F.L.j.nr. 900-12

# 104. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi nýggjari grindalóg

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið fyrst í Ólavsøku tingsetuni leggur uppskot um nýggja grindalóg fyri tingið.

**Viðmerkingar:**
Flestir av tingmonnum eru væl á einum máli um, at okkara gamla grindalóg treingir til endurskoðingar.

Hvussu grindadráp fer fram, er jú ógvuliga ójavnt frá grindavág til grindavág. Tíbetur verður grindadráp enn gjørt á flestu grindavágum við skili og harvið á mest humanan hátt, meðan tað tíverri alt ov ofta kemur fyri, at grindadráp endar í einum óhugnaligum — lítið menniskjaverdum niðurslaktingarhátti av hesum sakleysu skapningum. Kanska eina mest, tí at grindaformenn og avvarðandi myndugleikar missa tamarhald á grindamonnum, og verða teir als ikki aktaðir. Úrslitið verður so ofta, at ein vitleys niðurmorðan og niðurstingan við váknum av monnum, sum ikki duga at handfara grindavákn, fer fram. Í allar flestu førum er nýtsla av vákni púra óneyðug og átti at verið bannað, um ikki avgjørt neyðugt fyri bjargan úr lívsvanda frá ørvitisfiskum.

Tí verður tað rætta, eins og siður enn er á flestu grindavágum, at um grindin ikki ger landgongd, hvat sjálvandi verður roynt av øllum alvi og við skili miðað ímóti, at so einans verður høgt og skorið á háls frá báti, so slepst undan óneyðugum morðarii og djórapínslu.

Vitandi um, at eitt fullfíggjað lógaruppskot til eina nýggja

grindalóg, gjørt av flestu sýslumonnum og nógvum grindaformonnum, sett í verk av fyrrverandi fiskimálaráðharra Eli Nolsøe, hevur ligið úti í Tinganesi í eini 10-12 ár, so loyvi eg mær at seta fram omanfyri nevnda uppskot til samtyktar, og meti eg, at henda saman við eini djóraverndarlóg, sum eisini fer at fevna um grindadráp, at verandi og fyrikomandi óskil í grindadrápi okkum føroyingum til lítið rós fær ein enda.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í lóganevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, tann 25. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í lóganevndina. Eftir uppskotinum skal áleggjast landsstýrinum fyrst í ólavsøkutingsetuni at leggja fyri tingið uppskot til nýggja grindalóg. Fært verður fram, at okkara grindalóg treingir til endurskoðan, so sleppast kann undan tí djórapínslu, ið mangan fer fram í grindadrápi.

Nevndin hevur fingið at vita, at hvørki núverandi grindareglugerð ella uppskotið til nýggja grindareglugerð, sum talan hevur verið um, innihalda beinleiðis reglur um djóravernd, og mett verður, at hesar hoyra heima í eini djóraverndarlóg.

Nevndin hevur viðgjørt málið og heldur, at tað hastar at fáa eina tíðarhóskandi djóraverndarlóg og setir í staðin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið verður biðið um beinan vegin at leggja uppskot til djóraverndarlóg fyri tingið, sum eisini fevnir um grindadráp.

2. viðgerð 16. mai. Uppskot til samtyktar frá nevndini samtykt við 26-0 atkvøðum.

# 105. Studningur til hægri útbúgving uttanlands

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um studning til hægri úthúgving uttanlands.**

**§1.** Til føroyingar, ið nema hægri læru aðra staðni enn í danska ríkinum, letur landsstýrið úr »Grunninum til lærdan lestur« studning, ið svarar til ta studningshædd, hin lesandi hevði fingið tilsamans, um hann fekk útbúgving sína í danska ríkinum.

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om understøttelse til videreuddannelse udenlands.**

**§1.** Til færinger, som studerer andre steder end i det danske rige, uddeler landsstyret af »Grunninum til lærdan lestur« en understøttelse, der svarer til den understøttelse, den studerende ville modtage, hvis vedkommende fik sin uddannelse i det danske rige.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Útvið 100% av øllum føroyskum studentum lesa í løtuni í universitetum í Danmark. Hetta kemst fyri ein stóran part av, at fíggjarvánirnar hjá teim lesandi eru ov ringar til at fáa sær útbúgving í øðrum londum. Føroyingar, sum lesa í Danmark, fáa studning og lán frá landsstýrinum og frá Statens Uddannelsesfond, meðan

føroyingar, sum lesa í øðrum londum, bert fáa studning frá landsstýrinum, og henda studningshædd er lítið større enn tað, sum føroyingar í Danmark fáa úr landskassanum sum ískoyti til danska studningin. Undantiknir eru tó teir, sum eru í útbúgving í slíkum lærugreinum, sum ikki verður kent í í Danmark.

Tað má sigast at vera ódemokratiskt, at føroyskur ungdómur ikki fær høvi til, av fíggjarligum orsøkum, frítt at velja lestrarpláss sítt, bæði út frá persónligum og samfelagsligum sjónarmiðum.

Aftrat hesum kemur, at tað er ógagnligt og óheppið fyri føroyska samfelagið sum heild, at allir føroyskir akademikarar skulu venda aftur við sama fremmanda, mentunarliga árini.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at hesin spurningur, sum í peningi hevur so lítið at týða, eigur at verða greiddur nú beinanvegin.

1. viðgerð 26. aprfl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er framlagt av Tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 26. apríl beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) mælir til at taka undir við uppskotinum og ger hesar viðmerkingar:

Broytingar eru gjørdar í treytunum fyri at fáa stuðul frá Statens Uddannelsesstøtte. Nú fáa allir danskir ríkisborgarar, ið nema hægri útbúgving í norðurlondum, stuðul frá SU, treytað av, at tann lestrargrein, ið nomin verður, hevur fulla viðurkenning í Danmørk.

Sum dømi um útbúgvingar, ið ikki verða viðurkendar, er teologilestur í grannalondunum.

Er talan um lestur uttan fyri norðurlond, er altíð ivasamt, um lokna útbúgvingin verður viðurkend og heimilar starvsetan í alment starv í Føroyum. Sostatt er hetta uppskot, ið fyrstu ferð var framlagt í 1967, framvegis neyðugt at fáa framt. Umframt tørvin fyri at økja um peningaupphæddirnar til grunnin til lærdan lestur er neyðugt, at Landsskúlafyrisitingin kemur at virka soleiðis, at ungdómur kann venda sær higar fyri at frætta, um ein møgulig útbúgving uttan fyri danska ríkið er til hindurs fyri starvssetan í Føroyum. Her verður ikki bert hugsað um norðurlond, men eisini USA, Bretland og lond á europeiska meginlandinum. Annars verður

hildið, at stuðulin frá Statens Uddannelsesstøtte var skilabetri viðgjørdur, um umsitingin fór fram í Føroyum.

Hóast einasta rætta var, at øll útbúgvingar hjálp var føroysk burturav, er valla gjørligt við politisku støðuni í dag at mæla til yvirtøku av hesum málsøki.

Í staðin setur minnilutin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið tekur upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina um at yvirtaka stuðulsveitingarnar frá Statens Uddannelsesstøtte sum blokkstuðul.

Ein annar minniluti (Frederik Olsen og Jógvan Sundstein) tekur støðu í tingsalinum.

Ein triði minniluti (Eli Nolsøe) kann ikki taka undir við uppskotinum.

2. viðgerð 17. mai. §1 fall við 16-0, og uppskotið til samtyktar frá nevndini fall við 9-0.

# 106. Veðhald fyri láni til skipasmiðju hjá A/S J. Dahl, Gørðum, Vági

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til skipasmiðju hjá A/S J. Dahl, Gørðum, Vági.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri láni kr. 2.425.000,00 til partvísa fíggjan av nýggjari skipasmiðju hjá A/S J. Dahl, Gørðum, Vági.

*2. stk.* Lánið skal verða tryggjað við panti innan fyri 70% av virðinum av skipasmiðjuni.

**§ 2.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**lagtingslov om garanti for lån til skibsværft tilhørende A/S J. Dahl, Gørðum, Vági.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til at garantere for lån kr. 2.425.000,00 til delvis finansiering af nyt skibsværft tilhørende A/S J. Dahl, Gørðum, Vági.

*2. stk.* Lånet skal sikres ved pant indenfor 70% af værftets værdi.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
A/S J. Dahl, Gørðum, Vági, ætlar at byggja nýggja skipasmiðju í Vági í staðin fyri núverandi bedingina.

Kostnaðarætlanin er upp á kr. 16.500.000,00, av hesum eru nýíløgurnar mettar til umleið 14 mió.kr.

Prioritetsstøðan verður uppsett soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. prioritetur | Ídnaðargrunnurin ..... | kr. | 5.000.000,00 |
| 2. — | Memingargrunnurin ..... | — | 4.000.000,00 |
| 3. — | P/F Føroya Banki ..... | — | 1.900.000,00 |
| 4. — | Lán við landskassaveðhaldi ..... | — | 2.425.000,00 |
| | Tilsamans ..... | kr. | 13.325.000,00 |

Eftir løgtingslóg nr. 29 frá 11. mars 1982 um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir hevur landsstýrið heimild til í fíggjarárinum 1982/83 og 1983/84 at veðhalda fyri lánum upp til kr. 2.000.000,00 hvørt fíggjarár til smærri ídnaðarvirkir.

Tá landsstýrið metir, at tað er skeivt at nýta alla heimildina til einstaka játtan, og tá landsstýrið eisini er av teirri áskoðan, at tað er torført at geva ætlaða tiltakinum heitið »smærri ídnaðarvirki«, leggur landsstýrið fram uppskot um sjálvstøðuga lógarheimild til at veðhalda fyri láni til nýgerð av skipasmiðjuni hjá A/S J. Dahl, Gørðum, Vági.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tan 15. apríl beint í fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 21. og 28. apríl 1983 og á fundi 3. mai 1983 og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Adolf V. Hansen, Ove Mikkelsen, Svend Aage Ellefsen og Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) tilskilar, at tá stórar íløgur eru gjørdar í útbygging av øðrum skipasmiðjum, sum hava ov lítið

arbeiði, sum er, verður einki uppskot sett fram.

2. viðgerð 6. mai. §1 varð samtykt við 25-0. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Frederik Olsen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Ove Mikkelsen, Karin Kjølbro, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Atkvøddu ikki: Hilmar Kass, Erlendur Patursson, Petur Reinert, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen.

Burturstaddur: Atli Dam.

3. viðgerð 18. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1215-4. Lóg nr. 92 frá 12. oktober 1983.

---

# 107. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.**

§1. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1983/84 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 25 mió.kr.

§2. Treytirnar fyri, at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

I At líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

**lagtingslov om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.**

§1. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1983/84 at garantere for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25 mio.kr.

§2. Betingelserne for, at garanti ydes, er disse:

I At der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

IIa) Har talan er um fiskavirkir, *at* eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí peningi, ið veittur verður sambært hesi lóg. *At* fingin verða onnur veðhald fyri í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella fingin verða onnur lán, sum ikki krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambært hesi lóg.

IIa) *2. stk.* Landsstýrinum er í serligum førum, har talan er um fiskavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá regluni um kravið um 15%, sum nevnt er í 1. stk.

IIb) Har talan er um fiskiskip, *at* eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí veðhaldsupphædd, ið veitt verður sambært hesi lóg.

IIc) Har talan er um fiskiskip, har einstaklingur, partsreiðarar ella líknandi eru ognarar, *at* inngoldið er í minsta lagi út yvir kravda eginpeningin spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skipið skattaárið 1983/84, og *at* nýinngoldin verða 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.

IIa) Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder, *at* egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det beløb, der ydes i henhold til denne lov. *At* andre garantier tilvejebringes for mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i henhold til denne lov.

IIa) *Stk. 2.* Hvor der er tale om fiskerivirksomhed på småpladser, bemyndiges landsstyret til under særlige omstændigheder at fravige regelen om 15%, som er nævnt i stk. 1.

IIb) Hvor talen er om fiskerskibe, der tilhører aktieselskab, *at* egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garantibeløb, der ydes i henhold til denne lov.

IIc) Hvor der er tale om fiskerskibe, hvor enkeltpersoner, partsredere eller lignende er ejere, at der er indbetalt mindst ud over den udkrævede egenkapital sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet skatteåret 1983/84, og at nyindbetalt bliver 10% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften.

| | |
|---|---|
| §3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. | §3. Denne lov træder i kraft straks. |

**Viðmerkingar:**
Í fíggjarárinum 1982/83 vóru tvær lógir um »kreppulán«. Tann fyrra var løgtingslóg nr. 69 frá 21. mai 1982 um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna §8, tingmál nr. 143/1981. Samlaða veðhaldsupphæddin var upp á 10 mió.kr.
Seinra lógin var løgtingslóg nr. 99 frá 30. september 1982, løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir. Her var veðhaldsupphæddin 15 mió.kr. (tingmál nr. 5/1982).

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**
**I**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 25. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Eftir lógaruppskotinum fær landsstýrið heimild til at veðhalda fyri kreppulánum til fiskiskip og fiskavirkir upp á tils. 25 mió.kr. í hesum fíggjarári. Í seinasta fíggjarári var veðhaldsupphæddin 15 mió.kr.

Eftir §2, c, í uppskotinum skulu partsreiðarar umframt tey 10% eisini inngjalda í minsta lagi spardan skatt frá avskriving upp á skipið í skattaárinum 1983/84.

Undir 1. viðgerð var av onkrum tingmonnum ført fram, at eisini spardur skattur við avskriving í skattaárinum 1982/83 eigur at verða inngoldin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

*Meirilutin* (Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen og Adolf Hansen) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum, tó soleiðis at eisini spardur skattur í 1982/83 eigur at verða inngoldin. Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
til uppskot landsstýrisins:

| | |
|---|---|
| Í §2, II, c) verða orðini »skattaárið 1983/84« broytt til: »skattaárini 1982/83 og 1983/84«. | I §2, II, c) ændres ordene »skatteåret 1983/84« til: »skatteårene 1982/83 og 1983/84«. |

*Minnilutin* (Jørgen Thomsen) minnir á, at síðan fíggjarárið 1981/82 byrjaði, hevur landsstýrið lagt fram eini seks lógaruppskot um kreppulánsheimildir, leingjan av kreppulánsheimildum ella uppskot um øktan kreppulánsstuðul, so hvørt eitt ella fleiri skip og eitt ella annað virki, ið samgongan metti kreppulánsheimilað, kom til fulltroyttar kreppulánsmøguleikar.

Hetta hóast gongdin aftan á oljukreppuna í 1979 hevði prógvað, at tíðin var runnin frá loysnum av hesum slag, og hóast løgtingsmeirlutin longu í 1981 tók undir við meting javnaðarfloksins, at haldbetri varandi loysn mátti finnast í staðin fyri landsstýrisins løtuloysn.

Uppskot javnaðarfloksins um skilabøtur til fiskivinnuna við heimild til landsstýrið at taka upp til 70 mió.kr. í láni til umlegging av ólagaligari fígging fekk undir 1. viðgerð í november 1981 undirtøku frá stórum tingmeiriluta, men orsakað av §13 samgonguskjalsins og orsakað av tørvandi vilja og evnum hjá einstøkum samgongumanni til at góðtaka skilabetri loysnir enn teim av landsstýrinum uppskotnu varð uppskotið ikki samtykt.

Tí fingu vit fyribilsloysnina fyri december 1981, meðan bíðað varð eftir hini av løgmanni fráboðaðu varandi, nýskapandi og effektivu loysnini, sum koma skuldi áðrenn 1. januar 1982.

Hon kom tó ikki, og vit fingu tí fyribilsloysn fyri januar 1982, so februar 1982 og endaliga fyri mars 1982. Síðani komu tvær fyrbilslógir í 1982/83, og nú er aftur uppskot um fyribilsloysn fyri 1983/84 upp á 25 mió.kr.

Nú má tíðin vera komin til, at løgmaður avdúkar sína »fantastisku« loysn frá december 1981, ella at nýtiligt uppskot — sum skilabótauppskotið javnaðarfloksins — verður samtykt.

Minnilutin tekur tí bert undir við uppskoti um kreppulánsheimild undir teirri fortreyt, at á ólavssøku verður samtykt uppskot, sum annaðhvørt fylgir uppskoti javnaðarfloksins ella er eins nýtiligt sum tað.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum á ólavsøku 1983 at leggja fram uppskot um skilabøtur til fiskivinnuna soleiðis, at møguleiki er fyri umlegging til ódýra, lagaliga fígging, sum rakstur skipaflotans megnar at afturrinda.

*Minnilutin* (Erlendur Patursson) hevur í fíggjarnevndini funnist at, at í framløguskrivi landsstýrisins yvirhøvur ongar sum helst upplýsingar fylgja við uppskotinum. Tað einasta, sum nevnt verður í framløguskrivi landsstýrisins, eru tær báðar lógirnar — tann fyrra frá 21. mai 1982, tann seinna frá 30. september 1982 — báðar um veðhaldsheimild til hesi somu endamál upp á samanlagt 25 mió.kr. Aðrar lógir, sum framman undan høvdu verið í gildi, verða ikki nevndar.

Hesar atfinningar verða endurtiknar.

Tað minsta, ið av løgtingsmonnum má kunna krevjast av landsstýrinum í slíkum stórnáli, sum tað her snýr seg um, er, at tað gevur tinginum greiniligar upplýsingar um, hvussu henda lóggáva framman undan hevur roynst, har í millum hvussu stór veðhaldini hava verið, til hvørji skip og virki, tey hava verið givin, og hvørji tap, landsstýrið (landskassin) møguliga hevur havt.

Men tað er so ciðasørt, at slíkt verður gjørt.

Somuleiðis má kunna krevjast, at einbvørjar metingar verða gjørdar um støðuna í dag og um útlitið í framtíðini.

Men tað er so eiðasørt, at nakað tílíkt verður gjørt.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at landsstýrið sendir løgtinginum »nakin« miljón-uppskot til viðgerðar — at samtykkja hjá løgtingsmonnum í blindum. Tað sama hevur endurtikið seg ferð eftir ferð, ja er vorðin fastur vani. Tjóðveldisflokkurin hevur upp í røkur átalað hetta háttalag og ger tað aftur nú. Hann átalar ta háð og vanvirðing, ið landsstýrismenn sýna okkum løgtingsmonnum. Við slíkari mannagongd verður viðgerð okkara løgtingsmanna her á tingi bert eitt eiti og upp á kvaðsvís. Vit verða í veruleikanum ómynduggjørdir.

Nú má ein endi fáast á hesum óskili.

Í hesum máli eru, sum longu nevnt, ongar sum helst ítøkiligar

upplýsingar, og málið hevur tí í fíggjarnevndini onga veruleikaviðgerð fingið. Minnilutin kann ikki mæla løgtingsmonnum til við botni fyri eygunum at geva landstýrinum veðhaldsheimild upp á 25 mió.kr., men setir í staðin fyri uppskot meirilutans fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Málið verður endursent landstýrinum við áheitan um at fáa málið aftur við teimum upplýsingum, sum nevndir eru í minnilutaálitinum.

2. viðgerð 2. mai. Málið varð aftur beint í fíggjarnevndina, sum 16. mai legði fram nýtt

**Álit**
**II**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 25. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Undir 1. viðgerð varð spurt um týdningin av orðingini í §2, II, c: »spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skip«.

Fíggjarnevndin hevur útvegað eina frágreiðing frá Líkningarráð Føroya dagf. 4. mai 1983. Avrit av hesum ummælisskrivi er viðlagt málinum.

Eftir lógaruppskotinum fær landsstýrið heimild til at veðhalda fyri kreppulánum til fiskiskip og fiskavirkir upp á tils. 25 mió.kr. í hesum fíggjarári. Í seinasta fíggjarári var veðhaldsupphæddin 15 mió.kr.

Eftir §2, c, í uppskotinum skulu partsreiðarar umframt tey 10% eisini inngjalda í minsta lagi spardan skatt frá avskriving upp á skipið í skattaárinum 1983/84.

Undir 1. viðgerð var av onkrum tingmonnum ført fram, at eisini spardur skattur við avskriving í skattaárinum 1982/83 eigur at verða inngoldin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

*Meirilutin* (Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen og Adolf Hansen) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum, tó soleiðis at eisini spardur skattur í 1982/83 eigur at verða inngoldin. Samsvarandi hesum setir

meirilutin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

Í §2, II, c) verða orðini »skattaárið 1983/84« broytt til: »skattaárini 1982/83 og 1983/84«.

I §2, II, c) ændres ordene »skatteåret 1983/84« til: »skatteårene 1982/83 og 1983/84«.

*Minnilutin* (Jørgen Thomsen) minnir á, at síðan fíggjarárið 1981/82 byrjaði, hevur landsstýrið lagt fram eini seks lógaruppskot um kreppulánsheimildir, leingjan av kreppulánsheimildum ella uppskotum um øktan kreppulánsstuðul, so hvørt eitt ella fleiri skip og eitt ella annað virki, ið samgongan metti kreppulánsheimilað kom til fulltroyttar kreppulánsmøguleikar.

Hetta hóast gongdin aftan á oljukreppuna í 1979 hevði prógvað, at tíðin var runnin frá loysnum av hesum slag, og hóast løgtingsmeirlutin longu í 1981 tók undir við meting javnaðarfloksins, at haldbetri varandi loysn mátti finnast í staðin fyri landsstýrisins løtuloysn.

Uppskot javnaðarfloksins um skilabøtur til fiskivinnuna við heimild til landstýrið at taka upp til 70 mió.kr. í láni til umlegging av ólagaligari fígging fekk undir 1. viðgerð í november 1981 undirtøku frá stórum tingmeiriluta, men orsakað av §13 samgonguskjalsins og orsakað av tørvandi vilja og evnum hjá einstøkum samgongumanni til at góðtaka skilabetri loysnir enn teim av landsstýrinum uppskotnu varð uppskotið ikki samtykt.

Tí fingu vit fyribilsloysnina fyri december 1981, meðan bíðað varð eftir hini av løgmanni fráboðaðu varandi, nýskapandi og effektivu loysnini, sum koma skuldi áðrenn 1. januar 1982.

Hon kom tó ikki, og vit fingu tí fyribilsloysn fyri januar 1982, so februar 1982 og endaliga fyri mars 1982. Síðani komu tvær fyribilslógir í 1982/83, og nú er aftur uppskot um fyribilsloysn fyri 1983/84 upp á 25 mió.kr.

Nú má tíðin vera komin til, at løgmaður avdúkar sína »fantastisku« loysn frá december 1981, ella at nýtiligt uppskot — sum skilabótauppskotið javnaðarfloksins — verður samtykt.

Minnilutin tekur tí bert undir við uppskoti um kreppulánsheimild undir teirri fortreyt, at á ólavssøku verður samtykt uppskot,

sum annaðhvørt fylgir uppskoti javnaðarfloksins ella er eins nýtiligt sum tað.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum á ólavsøku 1983 at leggja fram uppskot um skilabøtur til fiskivinnuna soleiðis, at møguleiki er fyri umlegging til ódýra, lagaliga fígging, sum rakstur skipaflotans megnar at afturrinda.

*Minnilutin* (Erlendur Patursson) hevur í fíggjarnevndini funnist at, at í framløguskrivi landsstýrisins yvirhøvur ongar sum helst upplýsingar fylgja við uppskotinum. Tað einasta, sum nevnt verður í framløguskrivi landsstýrisins, eru tær báðar lógirnar — tann fyrra frá 21. mai 1982, tann seinna frá 30. september 1982 — báðar um veðhaldsheimild til hesi somu endamál upp á samanlagt 25 mió.kr. Aðrar lógir, sum framman undan høvdu verið í gildi, verða ikki nevndar.

Hesar atfinningar verða endurtiknar.

Tað minsta, ið av løgtingsmonnum má kunna krevjast av landsstýrinum í slíkum stórmáli, sum tað her snýr seg um, er, at tað gevur tinginum greiniligar upplýsingar um, hvussu henda lóggáva framman undan hevur roynst, har í millum hvussu stór veðhaldini hava verið, til hvørji skip og virki, tey hava verið givin, og hvørji tap, landsstýrið (landskassin) møguliga hevur havt.

Men tað er so eiðasørt, at slíkt verður gjørt.

Somuleiðis má kunna krevjast, at einhvørjar metingar verða gjørdar um støðuna í dag og um útlitið í framtíðini.

Men tað er so eiðasørt, at nakað slíkt verður gjørt.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at landsstýrið sendir løgtinginum »nakin« miljón-uppskot til viðgerðar — at samtykkja hjá løgtingsmonnum í blindum. Tað sama hevur endurtikið seg ferð eftir ferð, ja er vorðin fastur vani. Tjóðveldisflokkurin hevur upp í røkur átalað hetta háttalag og ger tað aftur nú. Hann átalar ta háð og vanvirðing, ið landsstýrismenn sýna okkum løgtingsmonnum. Við slíkari mannagongd verður viðgerð okkara løgtingsmanna

her á tingi bert eitt eiti og upp á kvamsvís. Vit verða í veruleikanum ómynduggjørdir.

Nú má ein endi fáast á hesum óskili.

Í hesum máli eru sum longu nevnt ongar sum helst ítøkiligar upplýsingar, og málið hevur tí í fíggjarnevndini onga veruleikaviðgerð fingið. Minnilutin kann ikki mæla løgtingsmonnum til við botni fyri eygunum at geva landsstýrinum veðhaldsheimild upp á 25 mió.kr., men setir í staðin fyri uppskot meirilutans fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Málið verður endursent landsstýrinum við áheitan um at fáa málið aftur við teimum upplýsingum, sum nevndar eru í minnilutaálitinum.

*+ skjal*

LÍKNINGARRÁÐ FØROYA
3800 Tórshavn, 4. mai 1983

Løgtingsins fíggjarnevnd
*att.* Ivan Johannesen, formann

Eftir áheitan skal her verða greitt frá, hvussu orðini »spardur skattur, sum stavar frá avskriving uppá skipið« eftir fatanini hjá undirritaða skulu tulkast í samband við §2, nr. II c í uppskoti til løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir (løgtingsmál nr. 107/1982).

Spardur skattur í einum ávísum skattaári er í hesum sambandi tann skattalækking, ið persónligur skattgjaldari hevur fingið orsakað av teirri góðtiknu avskriving í skattaárinum, sum stavar frá tí ávísa skipinum.

Við øðrum orðum skal spardur skattur her skiljast sum tann meirskattur, ið persónurin annars vildi goldið, um gjørdar avskrivingar uppá ávísa skipið vóru strikaðar.

L.v. Eyðun av Rógvi Olsen

Framhaldandi 2. viðgerð 17. mai. Uppskot til samtyktar frá Erlendi Patursson fall við 10-0, §1 samtykt við 20-0, §2 samtykt við broyting meirilutans í fíggjarnevndini við 19-0, §3 uttan atkvøðugreiðslu. Uppskot til samtyktar frá Jørgen Thomsen fall við 14-0.

3. viðgerð 18. mai. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1413-5-1. Lóg nr. 66 frá 30. juni 1983

# 108. Veðhald fyri láni til Miðvágs kommunu

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Miðvágs kommunu.**

**§1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Miðvágs kommunu úr »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« við upp til kr. 10.200.000,-.

**§2.** Hendan lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til Miðvágs kommune.**

**§1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til Miðvágs kommune fra »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« med op til kr. 10.200.000,-.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Rentan í danska lánsmarknaðinum er í seinastuni fallin so nógv, at nú er aftur áhugi fyri at taka lán í donskum kreditfeløgum. Effektiva rentan er sambært hjálagda tilboði frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« uml. 15,5%. Avdráttartíðin er 16 1/2 ár.

Lánið skal nýtast til ymiskar íløgur, jbr. hjálagt skjal.

Sambært lóg nr. 172 frá 24. mai 1955 »om statsgaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner« er neyðugt við landskassaveðhaldi fyri lánum, kommununrnar taka úr nevnda kredittfelag.

*Sí skjal 16*

1. viðgerð 15. aprfl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. aprfl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 25. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum fær kommunan heimild at læna áljóðandi 10.200.000 kr. úr kommunukreditfelagnum, sum við galdandi kursi verður mett at geva 8,5 mió.kr. netto. Í skjali til málið er tilskilað, hvat lánið skal nýtast til.

Nevndin hevur fingið eintak av fíggjarætlan kommununnar fyri 1983/84, og má kommunan metast at vera før fyri at kunna greiða sínar skyldur, eisini aftan á upptøku av omanfyri nevnda láni.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

2. viðgerð 2. mai. § 1 samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 4. mai. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 809-34-34 Lóg nr. 53 frá 20. mai 1983

# 109. Broytingar í lóg um føroysku kommunurnar

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja tað í viðlagda áliti frá nevnd, sett av landsstýrinum at endurskoða kommunulógina v.m., framsetta uppskot til broytingar í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar, soleiðis sum tað er sett fram av nevndini, men við teirri broyting, at pkt. 15, §41, 2. og 3. stk. í uppskotinum verður strikað.

**Viðmerkingar:**
Landsstýrið hevur einki at leggja afturat teimum í álitinum gjørdu viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar.

At landsstýrið ikki tekur undir við uppskotinum til orðing av §41, 2. og 3. stk. kemst av, at eftir uppskotinum kunnu bygda(r)- og býráð hereftir ikki velja aðrar enn bygda(r)- og býráðslimir sum umboð og nevndarlimir í felagskommunalar stovnar. Heldur ikki kunnu felagskommunalu stovnarnir velja aðrar enn bygda(r)- og býráðslimir í nevnd ella stýri. Hesum tekur landsstýrið ikki undir við.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í lóganevndina, sum 18. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 28. mars 1982 og undir 1. viðgerð 15. apríl beint í lóganevndina.

Landsstýrið setti í 1981 eina 5-manna nevnd at endurskoða kommunulógina og kommunuvallógina og at kanna møguleikarnar fyri broyttum máls- og gjaldsbýti ímillum landskassan og kommunurnar, herundir eina útjavningarskipan. Nevndin hevur latið landsstýrinum álit viðvíkjandi sjálvari kommunulógini, og hevur landsstýrið skotið upp at samtykkja tær av nevndini tilmæltu broytingar, men við teirri broyting, at pkt. 15, §41, 2. og 3 stk. í tilmælinum verður strikað.

*Viðv. punkti 3:*
Eftir galdandi lóg kann landsstýrið gera undantak fyri kommunur við undir 1,000 íbúgvum viðvíkjandi tali á bygdaráðslimum. Tá meirilutin samstundis heldur tað vera skeivt at sleppa ætlanini við galdandi lóg frá 1972 um, at miðast skal ímóti kommunusamanleggingum, soleiðis at kommunalu eindirnar koma at hava í minsta lagi 1000 íbúgvar, verður mælt frá at broyta §3 í galdandi lóg.

*Viðv. punkti 4:*
Ein meiriluti í lóganevndini (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Jona Henriksen) heldur, at nýval av formanni og næstformanni eigur at fara fram, um 2/3 av bygdaráðslimunum eru fyri hesum. Eisini verður mælt til at strika ásetingina um, at nýval av formanni bert kann fara fram eina ferð í valskeiðinum.

Ein samd lóganevnd heldur, at tá bygdaráðsformaður, næstformaður ella nevndarlimur søkir um at verða loystur frá tí starvi, hann er valdur í, eigur bygdaráðið at hava størri heimild at ganga umsóknini á møti. Sostatt verður skotið upp at broyta §5, stk. 2.

*Viðv. punkti 6:*
Mælt verður til at skoyta uppí §10, stk. 1 áseting um, at um bygdaráðslimi berst frá, skal bygdaráðið innkalla tiltaksmannin, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksmanni eru til staðar, jbr. §10, stk. 3.

*Viðv. punkti 17:*
Verður §3 óbroytt og stk. 2 og 3 í uppskotinum til orðing av §41 strikað, stendur eftir spurningurin, um møguleiki skal vera fyri at gera undantak fyri kommunur við undir 1000 íbúgvum frá §6 um, at bygdaráðsfundir ikki skulu vera almennir. Við tað at flestu kommunur við undir 1000 íbúgvum ikki eru skipaðar við nevndum, verður tað arbeiði, sum í størru kommununum er lagt til nevndirnar, ofta gjørt í bygdaráðsfundum. Sostatt eiga smærru kommunurnar framvegis at kunna fáa undantak frá §6 í kommunulógini.

Hin vegin er lóganevndin av teirri áskoðan, at landsstýrið eigur ikki at gera undantak fyri kommunur millum 1000 og umleið 600 íbúgvar í sama mun sum fyri smærru kommununurnar. Hesar kommunur eiga í ávísan mun at skipa seg við nevndum og eiga at hava almennar bygdaráðsfundir.

*Viðv. §12:*
Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Petur Reinert og Jona Henriksen) er av teirri áskoðan, at fíggjarnevndin eigur sjálv at avgera, um bygdaráðsformaðurin eisini skal vera fíggjarnevndarformaður. Tað kann vera ein fyrimunur, at hetta arbeiði kann latast øðrum bygdaráðslimi at taka sær av. Sostatt verður mælt til at broyta §12, stk. 1 og §16, stk. 1.

Vísandi til omanfyri standandi mælir ein meiriluti í lóganevndini (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Jona Henriksen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

1. Uppskot landsstýrisins til orðing av §§3 og 49 verður strikað.
2. Sum nýggj §4, 5. petti verður sett:
»Í starvstíð bygda(r)ráðsins kann fara fram nýval av formanni og næstformanni, um hetta verður sett á fundarskrá, sum verður kunngjørd bygda(r)ráðslimunum í minsta lagi 3 vikur framman undan fundinum og í minsta lagi 2/3 av øllum bygda(r)ráðslimunum atkvøða fyri tí. Tá so er, fer fram val av formanni eftir reglunum í

2. Som ny §4, stk. 5 sættes:
»I bygderådets funktionsperiode kan der foretages nyvalg af formand og næstformand, når dette er sat på dagsordenen, som bekendtgøres for bygderådsmedlemmerne mindst 3 uger før mødets afholdelse, og mindst 2/3 af samtlige medlemmer, dog for kommuner med 3 bygderådsmedlemmer alle undtagen 1 stemmer derfor. I så fald foretages valg af

2. stk.«

3. Í §5, 2. petti verður orðingin »undir serstøkum umstøðum« strikað.
4. §10, 1. petti verður orðað soleiðis:

»Berst bygda(r)ráðslimi frá at møta á bygda(r)ráðsfundi, skal bygda(r)ráðið kalla næsta mann á lista hansara inn, um so er, at bygda(r)ráðið í minsta lagi 7 dagar áðrenn fundin hevur fingið skrivliga fráboðan um fráveruna, jbr. eisini 3. petti.«

5. §12, 1. petti, 2. punktum verður orðað soleiðis:

»Í hesi nevnd sita bygda(r)-ráðsformaðurin og afturat honum 2 ella 4 aðrir bygda(r)-ráðslimir«.

6. Í §16, 1. petti verða orðini »jbr. tó §12, 1. petti« strikað.

formand og næstformand efter reglerne i stk. 2.«

3. I §5, stk. 2 udgår ordene »under særlige omstændigheder«.
4. §10, stk. 1 formuleres således:

»Såfremt et bygderådsmedlem er forhindret i at deltage i et bygderådsmøde, skal bygderådet indkalde hans suppleant, men kun hvis bygderådet har modtaget skriftlig meddelelse om hans forfald mindst 7 dage før mødets afholdelse, jfr. også stk. 3.«

5. §12, stk. 1, 2. punktum formuleres således:

»Bygderådets formand er medlem af udvalget, og udvalget har desuden 2 eller 4 medlemmer, som er valgt blandt bygderådets medlemmer.«

6. I §16, stk. 1 udgår ordene: »jfr. dog §12, stk. 1«.

Ein minniluti í nevndini (Øssur Dam Jacobsen) kann ikki taka undir við, at aktuellar bygdaráðsósemjur føra tað við sær, at stórar broytingar verða gjørdar í einari so týdningarmiklari lóg sum kommunulógini.

At smáar tillagingar verða gjørdar, taki eg undir við, men at føra tað innaftur, at bygdaráðsformaðurin kann skiftast út, tí at hann ikki handlar samsvarandi einum meiriluta í bygdaráðnum, kann ikki takast undir við. Ein natúrlig fylgja av slíkari broyting er, at tað vald og tann ábyrgd, sum seinastu árini hevur hvílt á t.d. býráðsformanninum í Tórshavn og Klaksvík, aftur verður flutt yvir á embætismenninar.

Eisini metir minnilutin, at tað er neyðugt, at formaðurin, sum úteftir hevur ábyrgdina av rakstrinum í kommununi, framvegis verður formaður í fíggjarnevndini, sum man vera ein av teimum týdningarmestu nevndunum, har øll fíggjarmál koma fyri.

Ein annar minniluti (Petur Reinert) mælir til at orða §4, stk. 5 soleiðis:

»Í starvstíð bygda(r)ráðsins kann fara fram nýval av formanni og næstformanni, um hetta verður sett á fundarskrá, sum verður kunngjørd bygda(r)ráðslimunum í minsta lagi 3 vikur framman undan fundinum, og at vanligur meiriluti atkvøður fyri tí. Tá so er, fer fram val av formanni og næstformanni eftir reglunum í 2. stk. Nýval av formanni og næstformanni eftir hesum petti kann bert fara fram einaferð í hvørjum valskeiði.«

»I bygderådets funktionsperiode kan der foretages nyvalg af formand og næstformand, når dette er sat på dagsordenen, som bekendtgøres for bygderådsmedlemmerne mindst 3 uger før mødets afholdelse, og almindeligt flertal stemmer derfor. I så fald foretages valg af formand og næstformand efter reglerne i stk. 2. Nyvalg af formand og næstformand i henhold til dette stk. må kun foregå én gang i hver valgperiode.«

Eisini mælir hann til at samtykkja orðingina av §41, soleiðis sum landsstýrisins kommunulóganevnd hevur mælt til.

Ein samd lóganevnd setir fram soljóðandi:

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum við gildi frá og við 1. januar 1985 at seta úr gildi nøkur av undantøkunum eftir §49 í kommunulógini fyri kommunur ímillum 600 og 1000 íbúgvar og í hesum sambandi at gera eina standard fyrisitingarreglugerð, sum er hóskandi fyri kommunur av hesi støddd. Í reglugerðini eigur m.a. at verða ásett, at talið av bygdaráðslimum skal vera 7 ella 9, at bygdaráðsfundirnir skulu vera almennir, og at bygdaráðið skal skipa seg við nevndum í ávisan mun.

2. viðgerð 31. mai. Broyting frá nevndini til punkt 1 samtykt við 23-0, broyting frá minniluta til pkt. 2 fall við 7-0, broyting frá meiriluta til pkt. 2 fall við 16-0, broyting frá nevndini til pkt. 3 samtykt við 20-0, broyting frá nevndini til pkt. 4 samtykt við 27-0, broyting frá nevndini til pkt. 5 samtykt við 20-0. Upprunauppskotið pkt. 1 samtykt við 25-0, pkt. 2 samtykt við 24-0, pkt. 4 fall við 9-0, pkt. 5 samtykt við 20-0, pkt. 6, 2. til og við 5. stk. samtykt við 22-0, pkt. 7 samtykt við 18-0, pkt. 8 samtykt við 18-0, pkt. 9 samtykt við 20-0, pkt. 10 samtykt við 18-0, pkt. 11 samtykt við 20-0, pkt. 12 samtykt við 22-0, pkt. 13 samtykt við 20-0, pkt. 14 fall við 2-0, pkt. 15, 1. petti samtykt við 18-0, 2. og 3. petti fall við 6-0, pkt. 16 fall við 16-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At málið soleiðis samtykt skuldi fara til 3. viðgerð fall við 15-0.

1. juni atkvøðugreiðsla. Uppskotið til samtyktar fall við 15-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 818-5-1

# 110. Rutukoyring í Vágum

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Adolf Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at reika fyri, at rutu- og taxakoyrarar í Vágum ikki verða hindraðir í teirra lógliga virki av Samferðslunevnd løgtingsins, og at parkeringsviðurskiftini við flogvøllin og á Oyragjógv verða greidd skjótast.

**Viðmerkingar:**
Orsakað av manglandi umboðan á tingi fyri vanligu løntakararnar í Vágum hava nakrir rutukoyrarar úr Vágum heitt á Framburðs- og Fiskivinnuflokkin um at leggja fyri tingið teir trupulleikar, teir hava at dragast við móti myndugleikunum.

Viðlagt fylgja skjøl, ið lýsa málið.

*Sí skjøl 18 A-E*

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum tann 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 12. apríl 1983 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur tann 5. mai 1983 havt fund við teir, ið rekta taxa- og rutukoyring í Vágum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Ove Mikkelsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) førir fram: Nevndin var í Vágum og tosaði við allar rutukoyrararnar um málið og var og hugdi at teimum støðum, har órætturin móti nøkrum av rutukoyrarunum verður útintur.

Á fundinum við teir 4 bussførararnar og teir 3 persónbilførararnar, sum saman røkja rutukoyringina í Vágum, kom fram, at á fundi fyri eini tíð síðan við táverandi landsstýrismannin í samferðslumálum Olaf Olsen var lovað bilførarunum, at ein avmerking skuldi gerast, og at menn komu vestur í Vágar at gera hesa merking, men at hin landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Páll Vang, gjøgnum bileftirlitið ella samferðslunevndina (nevndur varð Atli Jensen) og landsverkfrøðingastovnin hevði steðgað merkingini eftir áheitan frá einum av bussførarunum.

Teir 3 persónbilførararnir og 2 av bussførarunum søgdu, at einasta rætta loysnin var at merkja steðgipłássini á Oyragjógv og við flogvøllin, soleiðis at teir smærru bilarnir ikki vórðu fjaldir av bussunum.

5 av 7 bilførarum úttalaðu, at tveir av bussførarunum, sum í skift við hinar báðar bussarnar koyrdu aðru hvørja viku frá Oyragjógv, við vilja stillaðu bussar sínar soleiðis, at teir smærru bilarnir ikki skuldu síggjast og harvið missa møguligar kundar. Somu 5 heittu á nevndina um at loysa málið við at fáa eina merking í lag, soleiðis at bilarnir ikki fjaldu hvør annan.

Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at áleggja landsverkfrøðinginum at fáa merkingina við flogvøllin og á Oyragjógv gjørda sum skjótast, soleiðis at bilar ikki kunnu sperra fyri hvørjum øðrum ella á annan hátt vera við til at minka um inntøkumøguleikarnar hjá hvørjum øðrum.

2. viðgerð 18. mai. Upprunauppskotið fall við 4-0, og uppskot minnilutans í fíggjarnevndini (Adolf V. Hansen) fall við 4-0.

# 111. Berghol til Trøllanes

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

| **løgtingslóg um berghol til Trøllanes.** | **lagtingslov om tunnel til Trøllanes.** |
|---|---|
| **§1.** Landsstýrið verður heimilað at skipa fyri gerð av bergholi til Trøllanes. | **§1.** Landsstyret bemyndiges til at lade udføre tunnel til Trøllanes. |
| **§2.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. | **§2.** Denne lov træder i kraft straks. |

**Viðmerkingar:**
Samgongan er samd um, at landsstýrið 1. apríl í ár fer undir tunnelsgerð til Trøllanes, og semja er um at nýta 15 mió.kr. í hesum valskeiði til hetta endamál.

5 mió.kr. eru avsettar í fíggjarárinum 1982/83, og uppskot er um 5 mió.kr. í 1983/84, og ætlanin er at avseta 5 mió.kr. í 1984/85. So statt eru 10 mió.kr. tøkar 1. apríl í ár.

1. viðgerð 11. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð. §1 samtykt við 27-0 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnatalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Frederik Olsen, Juul Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.
Atkvøddu ikki: Hilmar Kass, Adolf Hansen, Pauli Ellefsen.
Burturstaddir: Jóannes Dalsgaard, Olaf Olsen.

§2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð samtykt við 24-0.

3. viðgerð 26. aprfl. Uppskotið samtykt við 29-0 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:
Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Frederik Olsen, Juul Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Óli Kristian Debes, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.
Atkvøddu ikki: Hilmar Kass, Adolf Hansen, Pauli Ellefsen.

F.L.j.nr. Lóg nr. 77 frá 4. august 1983

# 112. Agnstudningur og agnprísir

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um agnstudning og agnprísir.**

§1. Við tí endamáli at tryggja føroyska fiskiflotanum tað neyðuga útboðið av fyrsta floks agni til javnar prísir fyri longri tíðarskeið og at tryggja tí partinum av føroyska fiskiflotanum, sum veiðir agn til framleiðslu á føroyskum virkjum javnar avreiðingarprísir á agni, veitir landskassin Ráfiskagrunninum á fíggjarløgtingslógunum serliga agnstudningsupphædd.

§2. Nevndin fyri Ráfiskagrunnin, jbr. løgtingslóg nr. 15 frá 15. mai 1975 ásetir hámarksprís á agni, sum er framleitt í Føroyum til nýtslu á føroyskum fiskifari.

**lagtingslov om agntilskud og agnpriser.**

§1. Med det formål at sikre den færøske fiskerflåde det nødvendige udbud af første klasses agn til stabile priser over længere perioder og at sikre den del af den færøske fiskerflåde, der indhandler agn til tilvirkning på færøske virksomheder, stabile indhandlingspriser på agn, yder landskassen Råfiskefondet et specielt agntilskud over finanslagtingslovene.

§2. Udvalget for Råfiskefondet jfr. lagtingslov nr. 15 af 15. maj 1975 fastsætter maksimal pris på agn, der er tilvirket på Færøerne til anvendelse på et færøsk fiskerfartøj.

*Stk. 2.* Nevndin fyri Ráfiskagrunnin ásetir minstu avreiðingarprísir á agni, sum verður avreitt av føroyskum fiskifari til framleiðslu í Føroyum.

*Stk. 3.* Grundað á ásetta hámarksprísin, smb. 1. stk., og á upplýsingar frá agnframleiðarum og -seljarum um framleiðslu- og søluviðurskifti og metan av framleiðslukostnaði, flutningskostnaði, goymslu- og sølukostnaði og fullnaðargjaldi, ásetir Nevndin fyri Ráfiskagrunnin regluliga og í minsta lagi 14. hvønn dag ein avrokningarprís millum agnframleiðara og Ráfiskagrunnin.

**§3.** Agnseljarin avroknar í mesta lagi hámarksprísin til agnbrúkaran, smb. §2, 1. stk.

*Stk. 2.* Agnframleiðarin avroknar í minsta lagi avreiðingarprísin til agnavreiðaran fyri fyrsta floks agn, smb. §2, 2. stk.

*Stk. 3.* Agnstudningurin verður rindaður agnframleiðaranum úr Ráfiskagrunninum við muninum millum minsta avreiðingarprísin og avrokningarprísin, smb. §2, 2. og 3. stk.

*Stk. 4.* Agnseljari, sum selur føroyska agnframleiðslu til útlendskan keypara ella selur innanlendis til annað endamál enn tað undir §1 umrødda, afturrindar Ráfiskagrunninum agnstudningin, sum hertil er veittur.

*Stk. 2.* Udvalget for Råfiskefondet fastsætter minimalindhandlingspriser på agn, der indhandles af et færøsk fiskerfartøj til tilvirkning på Færøerne.

*Stk. 3.* På basis af maksimalprisen, jfr. stk. 1, og oplysninger fra agnproducenter og -sælgere om produktions- og salgsforhold og skøn over produktionsomkostninger, transportomkostninger, lager- og salgsomkostninger og dækningsbidrag fastsætter Udvalget for Råfiskefondet regelmæssigt og mindst hver 14. dag en afregningspris mellem agnproducent og Råfiskefondet.

**§3.** Agnsælger afregner højst maksimalprisen til agnbruger, jfr. §2, stk. 1.

*Stk. 2.* Agnproducent afregner mindst indhandlingsprisen til agnindhandler for første klasses agn, jfr. §2, stk. 2.

*Stk. 3.* Agntilskuddet betales agnproducenten af Råfiskefondet som differensen mellem den minimale indhandlingspris og afregningsprisen, jfr. §2, stk. 2 og 3.

*Stk. 4.* Agnsælger, som sælger færøsk agnproduktion til udenlandsk køber eller sælger i indlandet til andet formål end under §1 omtalte, tilbagebetaler Råfiskefondet tilskuddet, som er medgået dertil.

**§4.** Agninnflytara verður veittur studningur úr Ráfiskagrunninum til innflutnings av fyrsta floks agni fyri tær nøgdir, ið tørvur er á. Studningsupphæddin til innflytara og hámarksprísur til brúkara verða at áseta í hvørjum einstøkum føri.

**§5.** Prísáseting og avrokning við Ráfiskagrunnin eftir hesi lóg fylgja annars reglunum í løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 og reglugerð nr. 44 frá 7. mai 1976 fyri Ráfiskagrunnin.

**§6.** Keyp av fyrsta floks agni fyri lægri prís enn avreiðingarprísin og søla av agni fyri hægri prís enn hámarksprísin er forboðin. Brot á forboðið verður revsað við bót.

**§7.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1979 um agnstudning sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 18. mars 1980 og nr. 38 frá 20. mai 1981.

**§4.** Agnimportør ydes tilskud fra Råfiskefondet til import af første klasses agn for de mængder, der er behov for. Tilskud til importør og maksimalpris til agnbruger fastsættes i hvert enkelt tilfælde.

**§5.** Prisfastsættelse og afregning med Råfiskefondet i følge denne lov følger for øvrigt bestemmelserne i lagtingslov nr. 15 af 5. maj 1975 og reglement nr. 44 af 7. maj 1976 for Råfiskefondet.

**§6.** Køb af første klasses agn for lavere pris end indhandlingsprisen og salg af agn for højere pris end maksimalprisen er forbudt. Overtrædelse af forbudet straffes med bøde.

**§7.** Denne lov træder i kraft straks.

Samtidig ophæves lagtingslov nr. 37 af 1. juni 1979 om agntilskud som ændret ved lagtingslov nr. 24 af 18. marts 1980 og nr. 38 af 20. maj 1981.

**Viðmerkingar:**
Higartil galdandi agnstudningsskipan, sambært løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1979, við føstum agnstudningi pr. kg, veittum í søluliðinum, og við eini ógreinaðari prísceftirlitsskipan undir Nevndini fyri Ráfiskagrunnin hevur ikki verið fremjandi fyri javnar agnsøluprísir ella tryggjað flotanum tað neyðuga útboðið av agni, smb. skriv frá Nevndini fyri Ráfiskagrunnin til Føroya Løgting og Landsstýri 27. januar 1982.

Hetta uppskot til nýggja løgtingslóg um agnstudning og agnprísir broytir studningsskipanina soleiðis, at studningurin er treytaður av hámarksprísi í søluliðinum og minstaprísi í avreiðingarliðinum. Hervið kunnu javnir prísir tryggjast fyri longri tíðarskeið og eins prísir tryggjast hjá og frá øllum agnseljarum. Við tað at studningurin er lagdur í avreiðingarliðið og verður veittur í sambandi við innkeyp til agnframleiðslu, kann agnframleiðslan fremjast, sum tørvur er á.

Agnprísskipanin er lagað eftir teimum reglum, sum galda fyri ráfisk.

Við ásetta avrokningarprísinum, smb. §2, 3. stk., millum Ráfiskagrunnin og agnframleiðaran verður framleiðaranum og seljaranum tryggjað lønandi vinna uttan mun til ásetta hámarksprísin og avreiðingarprísin, smb. §2, 1. og 2. stk. Hesir valdast játtaðu studningsupphæddini til Ráfiskagrunnin og teimum undir §2, 3. stk. umrøddu framleiðslu- og sølukostnaðum. Lógaruppskotið umfatar í fyrstu syftu framleiðslu úr høgguslokki, makreli og sild, sum verða veidd av føroyskum fiskiførum, men kann eisini umfata onnur agnsløg, so sum brisling. Sum fyri annan ráfisk verður prísásetingin og avrokningin við Ráfiskagrunnin treytað av vrakaraváttan fyri feskleika og onnur góðskukrøv viðvíkjandi agni. Somuleiðis ger Vrakarastovnurin av í ivamálum viðvíkjandi góðsku á agni í søluliðinum.

Agnframleiðarin avroknar við Ráfiskagrunnin 14. hvønn dag sum fyri keyp av ráfiski. Hervið verður Nevndin fyri Ráfiskagrunnin í góðari tíð, eftir at agnveiðitíðin er av, før fyri at meta um, um tørvur verður á innfluttum agni. Av tí studningsupphædd, sum eftir er, kann studningur tá veitast innflytara fyri innflutning av fyrsta floks agni og tí nøgd, sum tørvur er á. Hámarksprísur til brúkaran verður ásettur samsvarandi hesum og tí givna innflutningsprísinum. Eisini fyri innflutt agn ger Vrakarastovnurin tær neyðugu góðskumetingarnar.

Við prísásetingini verður tryggjað javnvág millum fíggjarjáttan og agnstudningsveiting. Í ávísum førum kann avlop koma fyri, sum verður at seta í serligan tiltaksgrunn eftir somu reglum og við sama endamáli sum fyri tiltaksgrunninum undir Ráfiskagrunninum.

1. viðgerð 26. aprfl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 26. apríl beint í fíggjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 3. mai og hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam) setir í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um partapening í pf. Føroya Agngoymslu**

**§1.** Landskassans vegna setur landsstýrið 5 mió. kr. í partapeningi í partafelag, sum hevur til endamáls at tryggja agnveiting samsvarandi tørvi føroysku fiskivinnunnar.

*2. stk.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri rakstrarláni til felagið stórt 5 mió. kr.

*3. stk.* Felagið er meginfelag fyri agnsamtak føroysku fiskivinnunnar.

*4. stk.* Navn felagsins er p/f Føroya Agngoymsla, og heimstaður tess er Tórshavn.

**§2.** Fyri at útvega neyðugan pening til endamálið verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka 5 mió. kr. í láni.

**§3.** Felagið skal fyriskipa agngoymslu í hvørjari sýslu, keypa upp agn ella rávøru til agnfram-

**lagtingslov om aktiekapital i P/F Føroya Agngoymslu.**

**§1.** For landskassen indskyder landsstyret 5 mill. kr. i aktiekapital i et aktieselskab, der har til formål at sikre agnforsyning i overensstemmelse med de behov, det færøske fiskerierhverv har.

*Stk. 2.* Landsstyret får hjemmel til på landskassens vegne at garantere for et driftslån til selskabet på 5 mill. kr.

*Stk. 3.* Selskabet er fællesselskab for det færøske fiskerierhvervs agnsammenslutninger.

*Stk. 4.* Selskabets navn er P/F Føroya Agngoymsla, og dets hjemsted er Tórshavn.

**§2.** For at tilvejebringe nødvendig kapital til formålet får landsstyret bemyndigelse til på landskassens vegne at optage lån på 5 mill. kr.

**§3.** Selskabet skal administrere agnlager i hver syssel, opkøbe agn eller råvarer til agnproduk-

leiðslu, fyriskipa neyðugum agnflutningi ímillum goymslurnar og lata vinnuni agn fyri ein prís, ið er hin sami frá øllum goymslum felagsins.

§4. Landsstýrinum er heimilað at veðhalda fyri neyðugum fløgulánum til hvørja goymslu sær, tá hesi kunnu veðtryggjast innanfyri 90% av metingarvirði goymslunnar.

§5. Fyri felagnum situr nevnd við sjey limum, harav ein er valdur av Føroya Fiskimannafelag, ein av Meginfelag Útróðrarmanna, ein av Føroya Reiðarafelag, tríggir av Føroya Løgtingi og ein av Føroya Landsstýri. Hesin seinasti er formaður nevndarinnar. Nevndin setur leiðara og neyðugt starvsfólk at fyriskipa dagliga virki megindeildarinnar og í undirfeløgum, sum verða stovnað samb. §6.

§6. Av partapeningi sínum kann felagið í hvørjum einstøkum føri seta upp til 50% av partapeningínum í sýslufelag, ið saman við útróðrasamtøkum, egningarmiðstøðum, flakavirkjum, kommunum ella øðrum stovnsetir agnmóttøku, goymslu og útflýggjan.

*2. stk.* Har tað ikki er møguligt at stovnseta sýslufelag saman við partaeigarum í økinum, er p/f. Føroya Agngoymslu

tion, administrere nødvendig transport mellem lagrene og sælge agn til erhvervene til en pris, som er det samme for alle selskabets lagre.

§4. Landsstyret får hjemmel til at garantere for nødvendige investeringslån til hvert lager for sig, når disse kan pantesikres indenfor 90% af lagrenes vurderingssum.

§5. Selskabet, der styres af en bestyrelse på 7 medlemmer, hvoraf en vælges af Føroya Fiskimannafelag, en af Meginfelag Útróðrarmanna, en af Føroya Reiðarafelag, 3 af Færøernes Lagting og en af Færøernes Landsstyre. Den sidste er bestyrelsesformand. Bestyrelsen ansætter leder og nødvendigt personale til at forestå den daglige administration i hovedafdelingen og i underafdelingerne, der stiftes i overensstemmelse med §6.

§6. Af sin aktiekapital kan selskabet i hvert enkelt tilfælde sætte op til 50% af aktiekapitalen i sysselselskaber, der sammen med hjemmefiskeriselskaber, agncentraler, filétfabrikker, kommuner eller andre etablerer modtagelse af agnopbevaring og udlevering.

*Stk. 2.* Der, hvor det ikke har været muligt at etablere sysselselskab sammen med aktionærer i vedkommende område, får

loyvt at stovna undirfelag og útvega allan eginpeningin.

*3. stk.* Meginfelagnum er heimilað at gera sáttmála við eigarar av frystigoymslum um leigu, afturatbygging, umsiting, felags rakstur, uppisitaragjald, flutningsgjald og annað, tá nevndin metir, at slík avtala um rakstur felagsins vegna er lagaligast.

P/F Føroya Agngoymsla tilladelse til at stifte underselskab og fremskaffe hele egenkapitalen.

*Stk. 3.* Fællesselskabet får hjemmel til at gøre aftale med ejere af fryselagre om leje, tilbygning, administration, selskabets drift, lejeafgift, transportbetaling og andet, når bestyrelsen er af den formening, at en sådan aftale om selskabets drift er den mest formålstjenlige.

§7. Felagið verður rikið út frá vanligum rentabilitetssjónarmiðum, tó uttan órímiligan vinning av muninum millum keyps- og søluprís fyri rávøru og agn.

*2. stk.* Samlaðu útreiðslur samtaksins, herundir møguligar útreiðslur av megingoymslu, verða at líkna á samlaða umsetning meginfelagsins.

*3. stk.* Nevndin ásetur í samráð við prísásetingarnevndirnar fyri ráfisk og ídnaðarfisk ein rávøruprís, ið er galdandi fyri tríggjar mánaðir í senn.

*4. stk.* Til tess at tryggja lagaligasta agnprísin letur landskassin yvir fíggjarlógina agnstuðning til rakstur felagsins, og letur felagið á hvørjum ári áðrenn 1. oktober landsstýrinum eina meting um studningstørvin.

§7. Selskabet drives ud fra sædvanlige rentabilitetsbetragtninger, dog uden urimelig fortjeneste af forskelle mellem køb- og salgsprisen for råvare og agn.

*Stk. 2.* De samlede udgifter for fællesselskabet, herunder mulige udgifter af fælleslageret, udlignes på den samlede omsætning hos fællesselskabet.

*Stk. 3.* Bestyrelsen fastsætter i samråd med prisansættelsesudvalgene for råfisk og industrifisk en råvarepris, der er gældende for 3 måneder ad gangen.

*Stk. 4.* Med det formål at tilsikre den lempeligste agnpris betaler landskassen over finansloven agntilskud til selskabets drift og giver hvert år før den 1. oktober landsstyret en vurdering om behovet for støtte.

§8. Nevndin letur landsstýrinum uppskot til reglugerð fyri rakstur felagsins. Reglugerðin fær gildi við landsstýriskunngerð

§8. Bestyrelsen fremsender til landsstyret forslag til reglement for selskabets drift. Reglementet får gyldighed i henhold til

aftan á góðkenning av Føroya Landsstýri og løgtingsins fíggjarnevnd.

landsstyrets bekendtgørelse efter godkendelse af Færøernes Landsstyre og Lagtinget Finansudvalg.

§9. Henda lóg kemur í gildi 1. juni 1983.

§9. Denne lov træder i kraft den 1. juni 1983.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) metir, at uppskot landsstýrisins verður ov tungvunnið at umsita, bæði hvat viðvíkir áseting og umsiting, til dømis viðvíkjandi afturrindan eftir §3, 4. stk. og §4. Minnilutin loyvir sær tí at seta fram eitt uppskot, sum er meira lættvunnið at arbeiða við, eitt uppskot har stuðulin verður bert latin í seinasta enda, t.v.s. til síðsta lið.

Uppskotið hevur tríggjar høvuðsfunktiónir, nevniliga

a) við avreiðingarprísum at tryggja skipum, sum veiða rávøru til agnframleiðslu (§2).
b) við søluprísum at tryggja agnframleiðarum og agninnflytarum (§3).
c) við beinleiðis stuðli at tryggja brúkarunum ódýrt agn (§4).

Av nýskapanum í uppskotinum kunnu nevnast

1) Agnprísurin verður fyri brúkaran altíð tann sami sum tann avreiðingarprísur, brúkarin fær fyri sín feskfisk (§4). Sum er, er agnið altíð væl dýrari.
2) At ikki verður loyvt at dýrka agnið við millumhandlarum (§5).

Minnilutin Adolf V. Hansen setir fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um avreiðingarprísir, søluprísir og studning á agni.**

**lagtingslov om indhandlingspriser, salgspriser og tilskud til agn.**

§1. Við tí endamáli at tryggja tí partinum av føroyska fiskiflotanum, sum veiðir agn til framleiðslu á føroyskum virkjum,

§1. Med det formål at sikre den del af den færøske fiskeflåde, der indhandler agn til tilvirkning på færøske virksomheder, sta-

javnan og rímiligan avreiðingarprís, at tryggja framleiðarum og innflytarum av agni javnan og rímiligan søluprís og við beinleiðis stuðli at tryggja agnbrúkara ódýrt agn, ásetir Nevndin fyri Ráfiskagrunnin, jbr. løgtingslóg nr. 15 frá 15. mai 1975, avreiðingarprísir eftir §2, søluprísir eftir §3 og agnstuðul eftir §4.

bile og rimelige indhandlingspriser, at sikre indhandlere og importører af agn stabil og rimelig salgspris og gennem direkte tilskud at sikre agnforbrugere billigt agn, fastsætter udvalget for råfiskefondet, jvnf. lagtingslov nr. 15 af 15. maj 1975, indhandlingspriser i henhold til §2, salgspriser i henhold til §3 og agntilskud efter §4.

**§2.** Nevndin fyri Ráfiskagrunnin ásetir minstu avrokningarprísir á fyrsta floks sild, makreli og høgguslokki til agn, soleiðis at vælrikið, óavskrivað fiskifar við meðalveiðu kann forrenta eginpeningin við 15% árliga ella pro rata av hesum.

**§2.** Udvalget for råfiskefonden fastsætter mindste afregningspriser for første klasse sild, makrel og blæksprutter til agn, således at veldrevet, uafskrevet fiskefartøj med gennemsnitsfangst kan forrente egenkapitalen med 15% årlig eller pro rata av denne.

**§3.** Nevndin fyri Ráfiskagrunnin ásetir søluprísir fyri fyrsta floks agn, framleitt av sild, makreli og/ella høgguslokki. Søluprísirnir á føroyskt framleiddum agni verða at seta soleiðis, at vælrikið virki fær eitt rímiligt skiftisavlop pr. kg. framleitt agn.

*Stk. 2.* Søluprísurin á innfluttum agni verður at seta soleiðis, at sølufyritøkan fær ein rímiligan vinning.

**§3.** Udvalget for Råfiskefonden fastsætter salgspriser for første klasses agn, fremstillet af sild, makrel og/eller blæksprutter. Salgspriserne på færøsk fremstillet agn skal fastsættes således, at en veldrevet virksomhed får et rimeligt dækningsbidrag pr. kg fremstillet agn.

*Stk. 2.* Salgsprisen for importeret agn fastsættes således, at salgsvirksomheden får en rimelig fortjeneste.

**§4.** Nevndin fyri Ráfiskagrunnin ásetir og Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna avroknar agnstuðul millum agnseljara og agnbrúkara. Agnstuðulin er munurin millum agnsøluprísin

**§4.** Udvalget for Råfiskefonden fastsætter og Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna afregner agntilskuddet mellem agnsælger og agnbruger. Agntilskuddet er forskellen mellem

og meðal avreiðingarprísin á feskum fiski (jbr. løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980).

*Stk. 2.* Er meðalavrokningarprísurin á feskum fiski ájavnt við ella hægri enn agnsøluprísurin, jbr. §3, verður eingin agnstuðul latin.

**§5.** Tá prísir og stuðulsupphæddir verða settar eftir hesi lóg, eiga útreiðslur til millumhandlarar ikki at takast við í útrokningina.

**§6.** Ásetingarnar av prísi og agnstuðli eftir hesi lóg fylgja annars løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 og reglugerð nr. 44 frá 7. mai 1976 fyri Ráfiskagrunnin.

**§7.** Keyp og søla av agni, sum henda lóg umfatar, fyri aðrar prísir enn teir av Nevndini fyri Ráfiskagrunnin ásettu er forboðið og verður revsað við bót.

**§8.** Henda lóg kemur í gildi 1. juni 1983, tó undantikin §4, sum kemur í gildi 1. august 1983.

*Stk. 2.* 1. august 1983 fer úr gildi løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1979 um agningstudning sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 18. mars 1980 og nr. 38 frá 20. mai 1981.

agnsalgsprisen og middel indhandlingspris på fersk fisk (jfr. lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980.

*Stk. 2.* Er middelafregningsprisen på fersk fisk på højde med eller højere end agnsalgsprisen, jfr. §3, ydes intet agntilskud.

**§5.** Når priser og tilskudsbeløb fastsættes i henhold til denne lov, skal udgifter til mellemhandlere ikke medtages i udregningen.

**§6.** Fastsættelsen af pris- og agntilskud i henhold til denne lov følger ellers lagtingslov nr. 15 fra 5. maj 1975 og reglement nr. 44 af 7. maj 1976 for Råfiskefondet.

**§7.** Køb og salg af agn, som denne lov omfatter, for andre priser end de af Udvalget for Råfiskefonden fastsatte er forbudt og straffes med bøde.

**§8.** Denne lov træder i kraft 1. juni 1983, dog undtagen §4, som træder i kraft 1. august 1983.

*Stk. 2.* 1. august 1983 træder lagtingslov nr. 37 af 1. juni 1979 om agntilskud som ændret med lagtingslov nr. 24 af 18. marts 1980 og nr. 38 af 20. maj 1981 ud af kraft.

Frávik varð givið í tíðarfreistini at viðgera málið.

2. viðgerð 18. mai. §1 í uppskotinum samtykt við 29-0, §§2-6 samtyktar við 26-0, §7 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Broytingaruppskot frá minniluta (Atli Dam) §1 fall við 15-0 og broytingaruppskot frá minniluta (Adolf Hansen) til §1 fall við 5-0.

3. viðgerð seinri sama dag. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1408-6-3. Lóg nr. 62 frá 23. juni 1983.

# 113. Rutukoyring í Suðuroy

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Fyri fíggjarárið 1983/84 verður royndarrutukoyring í Suðuroy stovnsett. Henda koyring verður at fremja eftir skipan, sum førir við sær, at útreiðslurnar verða býttar í sama lutfalli sum higartil millum landskassan, kommunurnar og skúlaverkið. Endalig skipan verður fyrireikað til fíggjarárið 1984/85. Tá galdandi avtalur um rutukoyring í øðrum økjum ganga út, og verður omanfyri nevnda skipan at galda har.

**Viðmerkingar:**
Samferðslunevndin hevur arbeitt við uppskoti til eina rutu til skúlabarnakoyring í Suðuroy. Ætlanin er at byrja rutukoyringina 15. mai 1983. Peningur er avsettur á fíggjarlógaruppskotinum.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. mai 1983 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 12. apríl 1983 beint í fíggjarnevndina.

Nevnidin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Svend Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) tekur undir við málinum, men er tað ein fortreyt fyri tilmæli meirlutans í hesum máli, at royndarrutukoyringin verður gjørd við verandi materiell.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og vísir annars til tingsamtyktina um rutukoyring í Eysturoy frá 1981 og setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at skipa soleiðis fyri, at byrjandi rutusamaband beinan vegin verður sett á stovn millum tær bygdir í Eysturoy, sum nú einki rutusamband hava, og at hesar rutur koma at hava samband við »Ternuna«, »Tránd« og við Streymin.

2. viðgerð 17. mai. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot frá Adolf Hansen fall við 16-0 atkvøðum.

# 114. Veðhald fyri láni til Nordafar A/S

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Nordafar A/S.**

**§1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum rakstrarláni upp til 3 mió.kr. til Nordafar A/S.

**§2.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 1 mió.kr. til Nordafar A/S.

**§3.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til Nordafar A/S.**

**§1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et driftslån på maximum 3 mio.kr. til Nordafar A/S.

**§2.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på maximum 1 mio.kr. til Nordafar A/S.

**§3.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Nordafar A/S hevur søkt landsstýrið um veðhald fyri einum rakstrarláni uppá 3 mió.kr., so at virksemið í Føroyingahavnini kann halda fram.

Felagið hevur í 4 ár fingið landskassaveðhald fyri rakstrarlánum, meðan samráðst hevur verið við grønlendsku myndugleikarnar um framtíðar samstarv.

Nú hevur Nordafar A/S og Avataq í Julianehåb stovnað nýtt felag Aleq, sum skal leiga tveir føroyskar trolarar til fiskiskap í Grønlandi, og hevur Aleq fingið loyvi til, at hesir trolarar kunnu fiska minst 2.000 tons av toski í ár, býtt við 1000 tonsum.

Felagið Aleq vil gera sáttmálar við eigararnar av viðkomandi trolarum, ið tryggja trolarunum eina rímiliga inntøku. Tað verður sostatt Aleq og móðirfeløg tess, Avataq og Nordafar, ið bera ábyrgdina av møguligum halli av trolararakstrinum. Fyri at tryggja Nordafar møguleika fyri at bera eitt møguligt hall av trolarunum, søkir Nordafar um landskassaveðhald fyri 1 mió.kr. Somuleiðis vil Avataq søkja grønlendska landsstýrið um líknandi veðhald.

Áhugin fyri at royna teir smærru trolararnar í Grønlandi sýnist stórur, og er møguleiki fyri, at nøgdin, ið loyvd verður at fiska, verður økt í 1984. Tað verður hildið gagnligt, um smærri føroyskir feskfiskatrolarar fáa høvi at royna uttan fyri landleiðina, tí at tað lættir um veiðutrýstið á teir mest troyttu fiskastovnarnar undir Føroyum.

Landsstýrið metir ikki tað vera rætt at niðurleggja Føroyingahavnina beint nú og leggur tí uppskot fyri tingið um, at landskassin veðlieldur fyri einum rakstrarláni upp til 3 mió.kr. og einum láni uppá 1 mió.kr.

1. viðgerð 11. aprfl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. aprfl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1983 og andri 1. viðgerð 11. apríl beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og viðmerkir:

Ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Í meirilutaálitinum í løgtingsmáli nr. 119/1981: Veðhald fyri láni til Nordafar A/S var viðmerkt, at øll støðan og ognarviðurskiftini viðvíkjandi Nordafar A/S áttu at verða uppgjørd komandi ár, og vísti meirilutin til, hvat landskassin hevur veðhildið fyri, og hvat landskassin sum borgsmaður hevur rindað.

Tilskilað var í álitinum, at tá hugsað verður um lutfallið millum, hvat landskassin eigur í partapeningi í Nordafar A/S, og hvat landskassin hevur veðhildið fyri seinastu árini, var neyðugt, at ein avleiðing varð tikin og útint í hesum máli.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Olaf Olsen og Asbjørn Joensen) førir fram:

Tá nú aftur verður søkt um veðhaldsheimild sum tilskilað

í fyriliggjandi lógaruppskoti, og tá støðan viðvíkjandi tí, ið frammanfyri er umrøtt, er óbroytt, setir meirilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Olaf Olsen og Asbjørn Joensen) fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um, at støðan og viðurskiftini hjá Nordafar A/S verða uppgjørd og tær neyðugu avleiðingarnar verða tiknar.

Minnilutin (Atli P. Dam og Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum í ólavsøkutingsetuni at leggja fram uppskot um umskipan av viðurskiftum Nordafars, soleiðis at avleiðingin av, at landskassin ber so stóran part av ábyrgdini av rakstri felagsins, verður tikin, og nýskipanin sýnir seg í stýri, fyrisæti og rakstri felagsins framyvir á slíkan hátt, at løgtingið hevur fullan avgerðarrætt viðvíkjandi luti Nordafars í framtíðarsamvinnu grønlendinga og føroyinga ímillum.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) viðmerkir, at gjøgnum seinnu árini hevur landsstýrið veðhildið fyri Nordafar A/S fyri umleið 15,2 mió. kr., og verður nú biðið um veðhald fyri 3 mió. kr. aftrat. Partapeningur Føroya Løgtings í Nordafar er 550.000 kr. av einum samlaðum partapeningi upp á 1.430.000 kr. Eingin av hinum partaeigarunum hevur goldið ella veðhildið nakrantíð eins og tað almenna, sum higartil einans hevur havt milliónatal í halli og veðhaldi ferð eftir ferð fyri hetta felag, meðan tað er óvist, hvussu mikið hinir partarnir hava havt í ágóða av hesum tiltaki.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at øll samvinna grønlendinga og føroyinga millum eigur at byggja á tað grundarlag, at grønlendingar eiga allan avgerðarrætt í landi sínum, og tí má einhvør samvinna tjóðanna millum í Grønlandi byggja á hesum grundarlagi, og sostatt setir minnilutin (Ove Mikkelsen) einki uppskot fram.

2. viðgerð 15. apríl. Uppskot til samtyktar frá meirilutanum í fíggjarnevndini fall við 14-0 og frá minnilutanum fall við 16-0. Uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 24-0, §2 við 23-0, §3 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 15. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1408-4-3 Lóg nr. 42 frá 3. mai 1983

# 115. Endurgjald fyri stórar flutningsútreiðslur til avskiping av vørum

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Hans Marius Joensen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum yvir ráfiskagrunnin at skipa so fyri, at tey virki, sum hava serliga stórar útreiðslur við avskiping av lidnu vørum sínum, fáa ávíst endurgjald yvir ráfiskagrunnin, so skiftisavlop teirra kann sammetast við teirra, sum í so máta liggja betur fyri.

**Viðmerkingar:**

Í 1981, løgtingsmál nr. 54 settu tríggir tingmenn, Hans Marius Joensen, Juul Jacobsen, Anfinn Kallsberg, fram soljóðandi uppskot til samtyktar: Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við fiskaútflytarar at bera so í bandi, at flutningsútreiðslurnar frá framleiðara til útflutnings verða tær somu um alt landið.

Hetta til frama fyri tey smærru og meira avsíðisliggjandi virkini. Hesum uppskoti er einki frætt aftur frá enn, hóast bæði uppskot og fyrispurningur hava verið sett fram í sama máli síðani tá. Undirritaðu meta tí ikki, at nakað positivt kann spyrjast burtur úr hesum máli, og vilja vit tí royna aðra leið, soleiðis at hesi virki kunnu fáa møguleika fyri at virka á jøvnum føti við onnur virki í landinum, hetta skuldi verið møguligt líka so væl sum allar aðrar eykaviðbøtur, stuðulslóggávan til fiskivinnuna inniber.

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt av tjóðveldisflokkinum 25. mars og undir 1. viðgerð 12. apríl beint í fiskivinnunevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin ásannað, at avskiping-arkostnaðurin er ójavnur hjá teimum ymisku virkjunum, og at t.d. Nólsoy og Skopun eru serliga illa fyri í so máta, nevndin er av tí áskoðan, at eitthvørt eigur at vera gjørt fyri at bøta um henda ójavna.

Í fjør álegði tingið landsstýrinum at taka upp samráðingar við fiskaútflytarar at bera so í bandi, at flutningsútreiðslurnar frá framleiðara til útflutnings vera tær somu um alt landið.

Fiskivinnunevndin hevur havt fund við umboð fyri fiskasøluna um henda spurning, har greitt var frá, at spurningurin um puljing av avskipingarkostnaðinum hevur verið umrøddur millum limirnar í fiskasøluni, og teir vilja ikki ganga inn fyri eini tílíkari skipan.

Eisini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í ídnaðarmálum, hann sigur, at landsstýrið nú arbeiðir við málinum og millum annað kannar eina skipan, har eitt gjald verður tikið av øllum útfluttum fiski og býtt út aftur til flakavirkini í mun til flutnings-útreiðslurnar til avskipingar.

Uppskotsstillarin mælir til, at tær ójøvnu flutningsútreiðslur til avskiping verða útjavnaðar yvir ráfiskagrunnin.

Undir viðgerðini er komið fram, at avskipingarútreiðslurnar hjá flakavirkjum kunnu býtast upp í tríggjar bólkar, 1) Virkir, sum altíð avskipa beinleiðis av goymslu umborð í skip (onga eyka avskipingaútreiðslu), 2) Virkir, sum bæði avskipa beinleiðis av goymslu umborð á skip og stundum flyta vøruna í aðra havn til avskipingar (partvís eykaavskipingaútreiðslur), 3) Virkir, sum altíð mugu flyta vøruna í aðra havn til avskipingar (altíð eykaavskipinga-útreiðslur).

Av hesum sæst, at bólkur 1) hevur ongan eykaavskipingar-kostnað. Um vit t.d. lata kanna bólk 2) og finna fram til, at hann hevur ein meðal eyka avskipingarkostnað í mun til bólk 1 upp á 5 oyru pr. kg, og at bólkur 3) hevur ein meðal eyka avskipingarkostnað upp á 30 oyru pr. kg, so krevst fyri at javnstilla virkini á hesum øki, at bólkur 2) fær eitt ískoyti upp á 5 oyru pr. kg og bólkur 3) 30 oyru pr. kg.

Nú er tað so, at tað eru tey fáu virkini, sum eru í bólki 3), og tí mælir nevndin til, at umhugað átti at verið at latið bólk 3) fingið ein flutningsstudning, sum setir tey ájavnt við bólk 2), í hesum uppsetta føri verður tað 25 oyru pr. kg í studningi, sum kann verða útgoldin gjøgnum Lønjavningargrunnin.

Út frá tí omanfyri framførda setir ein samd nevnd fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti um útjavnan av avskipingarkostnaðinum, sum er ímillum flakavirkini, og leggja tað fyri løgtingið fyrst í Ólavsøkutingsetuni 1983.

Hetta uppskotið er at skilja á tann hátt, at allir møguleikar standa opnir hjá landsstýrinum at finna fram til bestu loysnina.

2. viðgerð 17. mai, atkvøðugreiðsla 18. mai. Uppskotið til samtyktar frá fiskivinnunevndini samtykt við 32-0 atkvøðum.

# 116. Lóg um minstuløn til útróðrarmenn

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til løgtingslóg um minstuløu til útróðramenn.**

**§1.** Hendan lóg heimilar, at deksfiskifør upp til 100 br. reg. tons mynstra manningarnar, og at hesar koma undir somu minstulønarupphædd, sum til eina og hvørja tíð er galdandi hjá mynstraðum skipsfiskimonnum.

*2. stk.* Mynstrað verður fyri tvey tíðarskeið: a) fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober til 31. december og b) fyri tíðarskeiðið frá 1. januar til 31. mars. Uppgjørt verður fyri hvørt mynstringarskeiðið sær. Eru fiskipartur og onnur inntøka, herundir sjúkradagpeningur og almannahjálp v.m., í einum mynstringarskeiði minni enn galdandi minstuløn hjá mynstraðum skipsfiskimonnum í sama tíðarskeiði, verður munurin goldin úr Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

**Lagtingslov om mindsteløn til hjemmefiskere.**

**§1.** Denne lov giver hjemmel til, at dæksfiskefartøjer op til 100 br. reg. tons mønstrer mandskabet, og at disse opnår samme mindsteløn, der til enhver tid er gældende for mønstrede fiskere på dæksfiskerfartøjer.

*Stk. 2.* Der mønstres for to tidsrum: a) for tidsrummet fra 1. oktober til 31. december og b) for tidsrummet fra 1. januar til 31. marts. Der foretages opgørelser for hver mønstringsperiode for sig. Er fiskeparterne og anden indtægt, herunder sygedagpenge, og offentlig forsorg m.v. i en mønstringsperiode mindre end den mindsteløn, mønstrede dæksfiskerfartøjer opnår i samme tidsrum, betales differencen af Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

*3. stk.* Fyri at koma undir reglurnar í hesi lóg má manningartalið á teimum í §1 nevndu deksfiskiførum ikki fara niður um 3 og ikki upp um 6. Av hesum kann 1 vera á landi í sambandi við egning.

*4. stk.* Hóast reglurnar í 2. stk. verður prísviðbótin ikki mótroknað minstuløthings, men verður hendan altíð goldin útyvir minstuløtina.

*5. stk.* Manningar á fiskiførum, sum koma undir reglurnar í hesi lóg, kunnu ikki fáa minstaforvinning tann partin av árinum, mynstrað verður.

§2. Treytin fyri, at manningin á einum deksfiskifari, sum rekur heimaútróður, kann koma undir minstuløn í einum mynstringarskeiði, er, at viðkomandi deksfiskifar í minsta lagi hevur 18 útróðrardagar í mynstringarskeiðnum.

*2. stk.* Í serstøkum førum kann Føroya Landsstýri gera frávik frá teimum í §2, 1. stk. galdandi reglum.

§3. Í samráð við Meginfelag Útróðrarmanna ásetir Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna nærri reglur fyri, hvussu ásetingarnar í hesi lóg skulu umsitast. Hesar reglur skulu góðkennast av Føroya landsstýri og løgtingsins figgjarnevnd.

*Stk. 3.* For at komme under reglerne i denne lov må mandskabet på de i § 1 nævnte fiskerfartøjer ikke være under 3 og ikke over 6. Af disse kan en være i land i forbindelse med agnarbejde.

*Stk. 4.* Trods reglerne i 2. stk. skal pristilskuddet ikke modregnes i mindstelønnen, men betales altid udover mindstelønnen.

*Stk. 5.* Mandskabet på fiskerfartøjer, der kommer under reglerne i denne lov, kan ikke opnå mindsteløn for den del af året, hvor der er mønstret.

§2. Betingelsen for, at mandskabet på et dæksfiskerfartøj, der driver hjemmefiskeri, kan komme under mindsteløn i en mønstringsperiode, er, at vedkommende dæksfiskerfartøj har mindst 18 fangstdage i mønstringsperioden.

*Stk. 2.* I særlige tilfælde kan landsstyret dispensere fra de i §2, stk. 1 gældende regler.

§3. I samråd med Meginfelag Útróðrarmanna fastsætter Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna nærmere regler for, hvordan bestemmelserne i denne lov skal administreres. Disse regler skal godkendes af Færernes landsstyre og lagtingets finansudvalg.

§4. Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1983.

§4. Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1983.

**Viðmerkingar:**

Ásannast má, at heimaútróðurin hevur havt og framvegis hevur rættiliga stóran týdning á nógvum plássum í landinum. Á hesum plássum er heimaútróðurin bæði bygdamennandi og arbeiðsskapandi.

Hesin parturin av flotanum gevur nógvum fiskavirkjum ein munagóðan part av rávøruni. Fiskurin, ið kemur frá útróðrarbátunum, er sera góður, og gevur hesin tí eina lidna framleiðslu, sum liggur á einum rættiliga høgum góðskustigi. Hetta er av stórum týdningi.

Egningin á landi gevur skúlaungdómi og pensionistum ávísar arbeiðsmøguleikar. Á nógvum plássum hava hesir bólkar ongar aðrar arbeiðsmøguleikar enn júst hesar. Somuleiðis er tað ein sannroynd, at egningin á landi og harvið heimaútróðurin geva tí uppvaksandi ættarliðnum eina avbera góða og sunna skúling á tí praktiska økinum.

Seinastu árini hevur heimaútróðurin verið í stórari afturgongd, og heldur henda gongd fram, er vandi fyri, at hesin parturin av vinnuni heilt dettur niðurfyri. Tað er stórt spell, um so verður. Hetta vil sjálvandi føra til enn størri arbeiðs- og vinnuloysi á nógvum plássum.

Av nevndu orsøkum heldur Javnaðarflokkurin ikki, at vit hava ráð til at lata henda partin av vinnuni doyggja út. Flokkurin loyvir sær tí at koma við uppskoti, sum hevur til endamáls at venda hesi skeivu gongd. Men fyri at fremja slík tiltøk er neyðugt fyrst at staðfesta orsøkina til ta skeivu gongdina.

Og orsøkin er sjálvandi tann, at menn ikki tora at binda seg til ein útróðrabát, tá ongin trygd er fyri, at ein rímilig úrtøka fæst. Heystið 1982 og ein partur av vetrinum við tala fyri seg. Javnaðarflokkurin ber ótta fyri, at verða tiltøk ikki framd nú, er vandi fyri, at tann svikaliga úrtøkan hjá heimaútróðrinum í vetur verður at føra til enn eitt afturstig fyri heimaútróðurin. Talan verður møguliga um mønustingin.

Skotið verður upp at fremja eina minstulønarskipan fyri útróðramenn. Eftir uppskotinum kunnu deksfiskifør upp til 100 br. reg. tons mynstra manningarnar, og koma hesar undir somu minstulønarupphædd sum mynstraðir skipsfiskimenn. Eftir uppskotinum er mynstringin bert galdandi fyri vetrahálvárið, sum er býtt sundur í tvey mynstringarskeið, soleiðis at annað skeiðið røkkur frá 1. oktober til 31. december, meðan hitt skeiðið røkkur frá 1. januar til 31. mars. Teir, sum koma undir minstuløn, kunnu ikki koma

undir minstaforvinning í tíðini, teir eru mynstraðir.

Eftir uppskotinum verður uppgjørt fyri hvørt mynstringarskeið sær. Í sambandi við uppgerðina verða fiskipartur og onnur inntøka, herundir sjúkradagpeningur og almannahjálp v.m., mótroknað galdandi minstuløn. Er tann samlaða úrtøkan í einum mynstringarskeiði minni enn galdandi minstaløn í sama tíðarskeiði, verður munurin goldin úr Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

Í uppskotinum verður ásett, at manningartalið á hesum fiskiførum ikki má fara niður um 3 og ikki upp um 6. Av hesum kann 1 vera á landi í sambandi við egning. Ein treyt fyri at koma undir mynstuløn er, at viðkomandi fiskifar hevur minst 18 útróðrardagar í einum mynstringarskeiði, men her fær landsstýrið eftir uppskotinum heimild til at gera frávik. Javnaðarflokkurin hugsar sær, at slík frávik verða gjørd, tá veðrið er heilt út av lagi vánaligt í langa tíð.

Tá minstiforvinningurin varð hækkaður í fjør, varð mett, at minstiforvinningurin fór at kosta lønjavningargrunninum 5 mió.kr. Ein minstaløn arskipan fyri vetrarhálvárið vil minka um útreiðslurnar til minstaforvinning við eini helvt. Talið av útróðrarmonnum er 1500. Javnaðarflokkurin metir, at hetta kann føra við sær eina eyka-útreiðslu fyri lønjavningargrunnin uppá 25-30 mió.kr. um árið.

1. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum 25. mars og við 1. viðgerð 26. apríl beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt hetta mál, sum gongur út upp á at tryggja útróðrarmonnum eina minstuløn. Fyrr í hesi tingsetuni er minstiforvinningurin hækkaður, og uppskot er framlagt fyri tingið um at hækka prísstudningin til manningina, hetta skuldi bøtt um úrtøkuna hjá útróðrarmonnum, men um tað eisini skal farast undir at fyriskipa minstuløn til útróðrarmenn, so er hetta eitt stórt og fløkt mál, sum krevur eina gjølliga viðgerð, ið kemur at taka sína tíð, men um tingið ynskir tað, vil fiskivinnunevndin arbeiða við málinum við tí í hyggju at leggja fram álit í komandi tingsetu, tá vit ikki siggja okkum førar fyri at viðgera hetta mál nóg gjølla nú,

áðrenn tingslit verður ein av fyrstu døgunum, og seta tí fram hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Fiskivinnunevndin arbeiðir víðari við málinum og leggur fram álit í komandi tingsetu.

2. viðgerð 17. mai. Atkvøðugreiðsla 18. mai. Uppskotið til samtyktar frá fiskivinnunevndini samtykt við 32-0 atkvøðum.

# 117. Føroyskir laksafiskimenn og íslendsk valteknisk rakstrarróp

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars varð við 17 atkvøðum fyri og 1 ímóti samtykt, at málið skuldi ikki leggjast fram.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya løgting skal við hesum siga frá sínum harmi um tey harðrendu orð og drastisku boð, sum landsstýrið læt útganga móti føroyskum laksafiskimonnum eftir móttøkuna av íslendska valtekniska rakstrarróps brævinum.

7. apríl varð skriv frá Adolf V. Hansen, løgtingsmanni, útbýtt, sum var soljóðandi:

Til Føroya Løgting.

Sum fólkavaldur tinglimur fari eg við hesum harðliga at mótmæla teirri viðgerð, løgtingsmál nr. 117/1982: *Føroyskir laksafiskimenn og íslendsk valteknisk rakstrarróp* fekk av tingformanninum.

Sum tingmonnum kunnugt, avgjørdi tingið við 17 atkvøðum at vísa hesum máli úr tinginum. Hetta fyri at sleiska fyri íslendingum.

Her skal verða gjørt vart við, at fyri tað fyrsta var málið ikki framlagt og kann tí ikki burturvísast við heimild í grein 21 í tingskipanini, ið heilt greitt fyrisetur, at møgulig burturvísing eigur at fara fram undir 1. viðgerð, og at uppskotsstillarin hevur rætt at hava orðið í málinum **áðrenn** álitanin um burturvísing verður at seta fram.

Fyri tað næsta var tingsins avgerð um burturvísing eitt beinleiðis brot á grein 77 í grundlógini sum sigur:

> »**Enhver er berettiget på tryk, i skrift og tale at offentliggøre sine tanker, dog under ansvar for domstolene. Censur og andre forebyggende forholdsregler kan ingensinde på ny indføres**«

Við tað at málið ikki var framlagt, er her talan um forhondsceensurering, ið sum kunnugt er bannað, eisini í einum lóggávutingi.

Annars eigur her at verða gjørt vart við, at tað júst er grein 77 í grundlógini, og tilsvarandi greinar í grundlógunum hjá øðrum demokratiskt stýrdum londum, sum er tann grundleggjandi munurin millum **demokrati** og **ikki demokrati.**

Út frá hesum fari eg at úttala, at verður tingmál nr. 117/1982: *Føroyskir laksafiskimenn og íslendsk valteknisk rakstrarrók* ikki lagt fram og fær ta viðgerð, tingið metir, at tí tilkemur, herundir møgulig burturvísing undir 1. viðgerð, meti eg hetta sum beinleiðis brot á tað grundleggjandi í demokratiinum og sum eina lógbrótandi jagstran av FØROYA FRAMBURÐS— OG FISKIVINNUFLOKKI.

Tað er púra rætt, at ein týskur politikari, áðrenn og undir seinna heimsbardaga, setti orðið propaganda fyribils í eitt ringt orð, men tann tíðin er langt síðan passé. Í dag er orðið aftur vorðið positivt, rósandi og vælmeint.

Á Føroya Løgtingi, 7. apríl 1983

Adolf V. Hansen

# 118. Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna

Ár 1982, hósdagin 28. apríl legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** §3, 1. punktum verður orðað soleiðis:

»Minstaløntin er pr. 1. apríl 1983 kr. 9.050,00 um mánaðin, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg.«

**2.** §4, 2. punktum verður orðað soleiðis:

»Minstiforvinningurin er pr. 1. apríl 1983 kr. 681,70 til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin, tó tá talan er um snelluveiddan fisk, bert hálvur minstiforvinningur.«

**lagtinglov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.**

**§1.** I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:

**1.** §3, 1. punktum formuleres således:

»Mindstelønnen er pr. den 1. april 1982 kr. 9.050,00 pr. måned, hver fisketur beregnet for sig.«

**2.** §4, 2. punktum formuleres således:

»Mindsteindtægten er pr. 1. april 1983 kr. 681,70 til hver af mandskabet for hver fiskedag, dog når der er tale om fisk, der er fanget med sneller kun halv mindsteindtægt.«

*2. stk.* Manningini á opnum báti verður eisini tryggjað ein minstaforvinningur av somu stødd sum í 1. stk.

*3. stk.* Treytin fyri, at minstiforvinningurin kann veitast, er, at viðkomandi persónur hevur havt minst 60% av síni skattainntøku stavandi frá útróðri árið fyri, og at hesin framhaldandi rekur somu høvuðsvinnu í ikki minni mát enn áður.

**3.** §4, 3. punktum verður orðað soleiðis:

»Lønjavningargrunninum verður heimilað at útvega neyðugar upplýsingar viðvíkjandi §4, stk. 1 og stk. 2, og avvarðandi vinnufelag/fólk og stovnar hava skyldu at lata neyðugt prógtilfar í sambandi við útinningina av nevndu stuðulsreglu.«

*2. stk.* Minstiforvinningurin verður hækkaður við 9,60 kr. fyri hvørji 3 stig, prístalið er oman fyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

**4.** §5, 1. stk. a verður orðað soleiðis:

»Á trolara í saltfiskaveiðu 25 oyru/kg saltfisk uppskipað vekt.«

*Stk. 2.* Mandskabet på åbne både tilsikres også en mindsteindtægt af samme størrelse som i stk. 1.

*Stk. 3.* Betingelsen for, at mindsteindtægten kan opnås, er, at vedkommende person har haft mindst 60% af sin skatteindtægt hidrørende fra hjemmefiskeri året i forvejen, og at denne fortsat driver hjemmefiskeri som hovederhverv i ikke mindre omfang end tidligere.

**3.** §4, 3. punktum formuleres således:

»Lønjavningargrunnurin får hjemmel til at tilvejebringe nødvendige oplysninger, der vedrører §4, stk. 1 og stk. 2, og de pågældende erhvervsselskaber/personer og institutioner har pligt til at udlevere nødvendigt bevismateriale i tilknytning til administrationen af uævnte støtteregel.

*Stk. 2.* Minsteindtægten forhøjes med kr. 9,60 for hver 3 points, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsbehandling sted. Dyrtidsregulering finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.

**4.** §5, stk. 1 a formuleres således:

»På trawler i fiskeri efter saltfisk 25 øre/kg opvejet vægt.«

**5.** Í §5, 1. stk. c verður »45 oyru/kg« broytt til »90 oyru/kg«.

**6.** §5, 1. stk. d verður orðað soleiðis:

»Á trolara í flakaveiðu (ikki svartkjaftaveiðu) 25 oyru/kg av flaki uppvigað vekt.«

**7.** Í §5, 1. stk. verður sett sum nýtt pkt. e:

»Á trolara í svartkjaftaveiðu 50 oyru/kg av flaki og farsi uppvigað vekt.«

**8.** Í §5, 1. stk. verður sett sum nýtt pkt. f:

»Á deksfiskifari við línu ella snellu á feskfiskaveiðu 50 oyru/kg, tó fyri brosmu og longu 60 oyru/kg.«

**9.** Í §5, 1. stk. verður sett sum sum nýtt pkt. g:

»Á trolara og við deksfiskifari við gørnum á feskfiskaveiðu 5 oyru/kg.«

**10.** §5, 1. stk. h verður orðað soleiðis:

»Á opnum útróðrarháti 50 oyru/kg. Hevur báturin bensinmotor, verður latið 9 oyru/kg eyka í studningi.«

**11.** Í §5, 1. stk. verður sett sum pkt. i:

»Á fiskifari undir 12 BRT, ið avreiðir sild ella brisling frá føroyskum firði til agn, frystingar ella saltingar 25 oyru/kg av silda- ella brislingaveiðu. Fyri hvørja ferð avreiðingarprísurin hækkar við

**5.** I §5, stk. 1 c ændres »45 øre/kg« til »90 øre/kg«.

**6.** §5, stk. 1 d formuleres således:

»På trawler i filétfiskeri (ikke blåhvillingsfangst) 25 øre/kg af filét opvejet vægt.«

**7.** I §5, stk. 1 indsættes som nyt pkt. e:

»På trawler i blåhvillingsfangst 50 øre/kg af filét og fars opvejet vægt.«

**8.** I §5, stk. 1 indsættes som nyt pkt. f:

»På dæksfiskerfartøj med line eller snelle på ferskfiskfiskeri 50 øre/kg, dog for brosme og lange 60 øre/kg.«

**9.** I §5, 1. stk. indsættes som nyt pkt. g:

»På trawler og på dæksfiskerfartøj med garn på ferskfiskefangst 5 øre/kg.«

**10.** §5, stk. 1 h formuleres således:

»På åben hjemmefiskebåd 50 øre kg. Har båden bensinmotor, er tilskudet 9 øre/kg ekstra.«

**11.** I §5, stk. 1 indsættes som pkt i:

»På fiskerfartøj under 12 BRT, der sælger sild eller brisling fra færøske fjorde til agn, indfrysning eller saltning, 25 øre/kg af silde- eller brislingefangst. For hver gang salgsprisen forhøjes med 10 øre/kg i

10 oyru/kg í meðal, lækkar studningurin við 1 oyra/kg. Studningurin fyri kg kann tó ikki verða hægri enn avreiðingarprísurin. Er talan um bát við bensinmotori, er studningurin 5 oyru/kg hægri.«

gennemsnit, falder tilskudet med 1 øre/kg. Tilskudet pr. kg kan dog ikke være højere end salgsprisen. Er der tale om båd med bensinmotor, er tilskudet 5 øre/kg større.«

**12.** Í §5, 2. stk. verða »pkt. e og pkt. g« broytt til »pkt. f og h«.

**12.** I §5, stk. 2 ændres »pkt. e og pkt. g« til «pkt. f og h«.

**13.** Í §6, 1. stk. verður sett sum pkt. a:

»Fiskiskip í svartkalva- og/ella hemaraveiðu 90 oyru/kg uppvigað vekt.«

**13.** I §6, stk. 1 indsættes som pkt. a:

»Fiskerskib i hellefisk- og/eller sildehajfangst 90 øre/kg opvejet vægt.«

**14.** Í §6, 1. stk. verður sett sum pkt. b:

»Trolari í svartkjaftaveiðu 50 oyru/kg av flaki og farsi uppvigað vekt.«

**14.** I §6, stk. 1 indsættes som pkt. b:

»Trawler i fangst efter blåhvilling 50 øre/kg af filét og fars opvejet vægt.«

**15.** Í §6, 1. stk. verður sett sum pkt. c:

»Trolari, sum hevur ella kann fáa veiðuloyvi uttan fyri føroysku landleiðina til saltfiska-, frysti- ella ísfiskaveiðu, á ferskfiskaveiðu í føroyskum, útlendskum ella altjóða sjóøki, 8 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 47 oyru/kg, um hesi fiskasløgini eru veidd á føroysku landleiðini.«

**15.** I §6, stk. 1 indsættes som pkt. c:

»Trawler, som har eller kan opnå fangsttilladelse uden for færøsk fiskeriterritorium til saltfiske-, fryse- eller isfiskefangst, på ferskfiskefangst i færøsk, udenlandsk eller internationalt søterritorium 8 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 47 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på færøsk fiskeriterritorium.«

**16. Í §6, 1. stk. verður sett sum pkt. d:**

»Trolari við upp til 1400 HK høvuðsmaskinu, sum ikki kemur undir fyri-

**16.** I §6, stk. 1 indsættes som pkt. d:

»Trawler med op til 1400 HK hovedmaskineri, som ikke kan henføres un-

setningarnar í punkt b, í feskfiskaveiðu á føroysku landleiðini uttan fyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum, og trolarar á iðnaðarveiðu við feskfiski sum hjáveiðu, av hesi veiðu 36 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 73 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini. Fyri trolarar við høvuðsmaskinu uppá 1400 HK ella yvir verður studningurin ávikavist 43 oyru/kg og 80 oyru/kg.«

**17.** Í §6, 1. stk. verður sett sum punkt e:

»Fiskifar við trolloyvi til feskfiskaveiðu nærri landi enn 12 fjórðingar úr grundlinjunum 19 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 56 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini.«

**18.** Í §6, 1. stk. verður sett sum punkt f:

»Fiskifar 110 BRT og yvir í feskfiskaveiðu við línu og snellu 36 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 73 oyru/kg, um hesi eru veidd á føroysku landleiðini.«

**19.** Í §6, 1. stk. verður sett sum punkt g:

der forudsætningerne i punkt b på ferskfiskefangst på det færøske fiskeriterritorium uden for 12 sømil fra grundlinjerne, og trawlere på industrifiskefangst med fersk fisk som bifangst, af denne fangst 36 øre/kg, dog for brosme, lange blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 73 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på færøsk fiskeriterritorium. For trawlere med hovedmaskineri på 1400 HK eller derover bliver tilskudet henholdsvis 43 øre/kg og 80 øre/kg.«

**17.** I §6, stk. 1 indsættes som punkt e:

»Fiskefartøj med trawltilladelse til ferskfiskefangst nærmere land end 12 sømil fra grundlinjerne 19 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 56 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på færøsk fiskeriterritorium.«

**18.** I §6, stk. 1 indsættes som pkt. f:

»Fiskefartøj på 110 BRT og derover på ferskfiskefangst med line og snelle 36 øre/kg, dog for brosme, lange blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 73 øre/kg, såfremt disse er fanget på færøsk fiskeriterritorium.«

**19.** I §6, stk. 1 indsættes som punkt g:

»Øll garnaskip og fiskifør undir 110 BRT á línu-, snørís- ella snelluveiðu 19 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 56 oyru/kg, um hesi eru veidd á føroysku landleiðini.«

**20.** Í §6, 1. stk. verður sett sum nýtt pkt. h:
»trolari í svartkjaftaveiðu til landingar til matna í Føroyum 38 oyru/kg.«

**21.** Sum nýggj §7 verður sett:
»a. Til trolara við høvuðsmaskinu uppá 1400 HK ella yvir, sum ikki koma undir fyrisetningarnar í §6, 1. stk. pkt. c, 40 oyru/kg uppvigað vekt fyri fiskasløgini blálongu, kongafiskur, svartkalvi og langasporl.

b. Til fiskifør 110 BRT og yvir í feskfiskaveiðu við línu frá 1. mai til 1. oktober 1983 40 oyru/kg uppvigað vekt fyri fiskasløgini brosma, longa, blálonga, svartkalvi, um hesi eru veidd á føroysku landleiðini.«

*2. stk.* Í báðum førum verður prísískoyti at býta millum manning og skip sambært sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og við-

»Alle garnskibe og fiskefartøjer under 110 BRT på line-, håndline- eller snellefiskeri 19 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 56 øre/kg, såfremt disse er fanget på færøsk fiskeriterritorium.«

**20.** I §6, stk. 1 indsættes som nyt pkt. h:
»trawler i blåhvillingsfangst, landet til konsum på Færøerne 38 øre/kg«.

**21.** Som ny §7 indsættes:
»a. Til trawlere med hovedmaskineri på 1400 HK eller derover, der ikke kommer under forudsætningerne for §6, stk. 1, pkt. c, 40 øre/kg opvejet vægt for fiskesorterne blålange, rødfisk, hellefisk og skolæst.

b. Til fiskefartøjer 110 BRT og derover på ferskfiskefangst med line fra 1. mai til 1. oktober 1983 40 øre/kg opvejet vægt for fiskesorterne brosme, lange, blålange, hellefisk, såfremt disse er fanget på færøsk fiskeriterritorium.«

*Stk. 2.* I begge tilfælde skal pristilskuddet fordeles mellem mandskab og skib i henhold til kontrakt mellem Føroya Reiðarafelag og vedkomen-

komandi yrkisfelag.

**22.** Sum nýggj §8 verður sett: »Studningurin eftir §5, 1. stk. punktum f, g og h og §6, 1. stk. punktini c, d, e, f og g og §7, 1. stk. punktini a og b verða bert latin fyri rundan fisk og svartkalva, kruvdan, konga-fiskur undantikin, við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum.«

**23.** Sum nýggj §9 verður sett: »Hóast skipari ella annar av manningini eftir sáttmála fær meiri enn ein mansspart, verður studningurin til hansara bert roknaður av einum mansparti. Er mynstrað fyri minni enn heilan part, fær viðkomandi lut í mun til partin. Í sjálvdráttarveiðu verður býtið at laga seg eftir teimum býtisreglum, sum nýttar eru í hesum veiðuhátti.«

de fagforening.

**22.** Som ny §8 indsættes: »Tilskuddet efter §5, stk. 1, punkterne f, g og h og §6, stk. 1, punkterne c, d, e, f og g og §7, stk. 1, punkterne a og b ydes kun for rund fisk og hellefisk, renset, rødfisk undtaget, med hoved, der er strubeskåret og godt renset og indhandlet på Færøerne.«

**23.** Som ny §9 indsættes: »Selvom skipper eller andre af mandskabet i henhold til kontrakt får mere end en mandspart, beregnes tilskuddet til vedkommende kun af een mandspart. Er der mønstret for mindre end een hel part, får vedkommende andel i henhold til parten. Såfremt hver af mandskabet fisker for sig, foretages fordelingen efter de fordelingsregler, som anvendes i en sådan fangstmåde.«

**§2.** Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1983, tó fær §6, 1. stk. h gildi frá 1. juni 1983.

**§2.** Denne lov træder i kraft den 1. april 1983, dog træder §6, stk. 1 h først i kraft den 1. juni 1983.

**II**

**Uppskot til løgtingslóg um eykastudning til veiðu uv idnaðarfiski.**

**§ 1.** Tá ið fiskur, ið veiddur er í russiskum, norskum ella norðsjóarøki, verður landaður til ídnað í Føroyum, verður til føroyskt fiskifar latið í eykastuðningi 12 oyru/kg. Studningurin verður at býta millum manning og skip sambært sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag.

**§ 2.** Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1983.

**Forslag til lagtingslov om ekstra tilskud til fangst af industrifisk.**

**§ 1.** Ved landing af fisk, der er fanget i russisk, norsk eller nordsøområde til industri på Færøerne ydes til færøsk fiskerfartøj i ekstra tilskud 12 øre/kg. Tilskuddet deles mellem mandskab og skib i henhold til kontrakt mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft den 1. april 1983.

**III**

**Uppskot til løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.**

**§ 1.** At lækka um prísin á brennidolju til føroysk deksfiskifør í fiskiveiðu verða úr landskassanum latin 32 oyru/litur í studningi.

*2. stk.* Fær skip brennidolju fyri lægri prís enn 260 oyru/litur, lækkar studningurin við 1/2 oyra fyri hvørt oyra, prísurin av brennidolju er niðan fyri 260 oyru/litur.

**Forslag til lagtingslov om brændselsolietilskud til fiskeskibe.**

**§ 1.** Til nedbringelse af prisen af brændselsolie til færøske fiskeskibe i fiskeri ydes af landskassen 32 øre/liter i tilskud.

*Stk. 2.* Såfremt et skib får brændselsolie til en lavere pris end 260 øre/liter, formindskes tilskuddet med 1/2 øre for hvert øre, prisen på brændselsolie er under 260 øre/liter.

§2. Í eykastudningi fyri rundan fisk og svartkalva, kruvdur, kongafiskur undantikin, við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum, verður fyri at lækka um útreiðslurnar til brenniolju latin í studningi 5 oyru/kg fyri allan línu-, snellu- og garnaveiddan fisk, tó 10 oyru/kg fyri trolveiddan. Studningurin verður roknaður av uppvigaðu vektini.

§3. Studningsskipanin verður fyrisitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna. Fyri olju, keypta í Føroyum verður studningurin avroknaður beinleiðis til oljufeløgini.

§4. Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1983, samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 1980 um brenniolju-studning til fiskiskip, og sum lógin er broytt við løgtingslógunum nr. 39 frá 20. mai 1981 og nr. 71 frá 21. mai 1982.

§2. I ekstra tilskud for rund fisk og hellefisk, renset, rødtisk undtaget, med hoved, som er strubeskåret og godt renset og indhandlet på Færøerne ydes for at formindske udgifterne til brændselsolie et tilskud på 5 øre/kg for al line-, snelle- og garnfanget fisk, dog 10 øre/kg for trawlfanget. Tilskuddet beregnes af den opvejede vægt.

§3. Tilskudsordningen administreres af Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna. For olie, der er indkøbt på Færøerne, afregnes tilskuddet direkte til olieselskaberne.

§4. Denne lov træder i kraft den 1. april 1983, og samtidig træder ud af kraft lagtingslov nr. 25 af 18. marts 1980 om brændselsolietilskud til fiskeskibe, og som loven er ændret ved lagtingslovene nr. 39 af 20. maj 1981 og nr. 71 af 21. maj 1982.

**Viðmerkingar:**

| | Stuðul til fiskivinnuna (í 1000 kr.) 1982/83 | 1983/84 |
|---|---|---|
| 1. Minstaløn (hækkast við 500-600 kr. til 9.020 kr.) | 6.000 | 6.500 |
| 2. Minstiforvinningur (hækkast við 370 kr. til 678,60 kr.) | 1.200 | 3.000 |
| 3. Prísískoyti til saltfisk | 2.500 | 2.750 |
| 4. Útróðrarstudningur og landingarstudningur | 13.500 | 19.300 |
| 5. Flakastudningur | 700 | 325 |
| 6. Svartkjaftastudningur | 0 | 900 |
| 7. Hemara- og svartkalvastudningur | 200 | 900 |
| 8. Ídnaðarstudningur | 5.000 | 7.500 |
| 9. Brennioljustudningur | 38.500 | 23.000 |
| 10. Agnstudningur | 9.000 | 9.000 |
| 11. Rakstrarstudningur | 38.000 | 47.600 |
| 12. Frítíðarløn | 1.400 | 1.800 |
| 13. Fyrisæti | 1.500 | 1.800 |
| 14. Rentuútreiðslur | 500 | 300 |
| 15. Ráfiskagrunn I | 72.000 | 10.000 |
| 16. Ráfiskagrunn II | | 55.000 |
| 17. Grunnur til fígging av fiskiskapsroyndum á fremmandum høvum | 3.000 | 3.000 |
| 18. Serligur grunnur til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað | 10.000 | 7.000 |
| 19. Prísískoyti til feskan fisk 0/40 | 0 | 2.600 |
| 20. Flutningsstudningur | | 300 |
| | 203.000 | 202.575 |

**Viðmerkingar til tær ymsu broytingarnar í uppskotinum:**

1. Minstaløn**in** verður mett at kosta umleið 500.000 kr. meira enn seinast.
2. Minstiforvinningur er í hesi tingsetu hækkaður upp at verða dupult so nógv pr. dag sum seinast, og verður tí játtanin hækkað úr 1,2 mió. kr. til 3 mió. kr. Tá løgtingið seinasta vetur hækkaði minstaforvinningin, var grundgevingin tann, at ein útróðrardagur var í minsta lagi tveir arbeiðsdagar, og var her hugsað um, at egning og viðlíkahald av línureiðskapi á landi skuldi roknast við sum partur av veiðuferðini. Í fyriliggjandi uppskoti er uppskot,

at manning á opnum báti kemur undir hesa somu skipan, og er vanligasti veiðuhátturin snella, har omanfyri nevnda grundgeving ikki er til staðar, og verður tí mælt til, at minstiforvinningurin er í mát við ein arbeiðsdag.

3. Raksturin hjá saltfiskatrolarunum var góður í fjør, og útlitið fyri í ár er eisini rættiliga gott, so tað verður ikki rátt til at taka rakstrarstudningin inn aftur, men harafturímóti prísískoytið til manningina, ikki við 50 oyrum/kg, sum tað var frammanundan, men við 25 oyrum/kg.
4. Her verður rátt til at seta studningin á línu- og snelluveiddum fiski til 50 oyru/kg, uttan at hesin verður avtrappaður. Her var studningurin 32 oyru/kg, men er lækkaður til 24 oyru/kg, av tí at hann lækkaði við einum oyra, hvørja ferð prísurin fór upp við 10 oyrum. Hinir manningastudningarnir á útróðri og feskfiskaveiðu eru óbroyttir.
5. Her verður mælt til, at manningini verður veittur ein stuðul uppá 25 oyru/kg av flaki, har tað ikki er veiða av svartkjafti.
6. Fyri veiðu av svartkjafti til matna verður veittur ein stuðul uppá 50 oyru/kg til manningina og 50 oyru/kg til skipið av hvørjum framleiddum kg av flaki ella farsi. Av tí at her kann roknast við, at nøgdin økist, verður mælt til at hækka játtanina frá 700.000 kr. til 3.500.000 kr.
7. Mælt verður til at hækka játtanina til hemara og svartkalvaveiðuna, serliga fyri at fáa menn at veiða av tí stóru svartkalvakvotuni, sum vit hava við Kanada. Mælt verður til at veita eitt prísískoyti uppá 90 oyru/kg.
8. Mælt verður til at játta 12 oyru/kg av øllum ídnaðarfiski, sum veiddur verður í russiskum, norskum og Norðsjóarøkinum, um veiðan verður landað í Føroyum.
9. Mælt verður til at lækka oljustudningin frá 44 til 32 oyru/liturin. Harnæst verður mælt til at lækka oljuprísin við 1/2 oyra fyri hvørt oyra, prísurin fellur niður um 2,60 pr. l. Oljustudning, sum veittur er pr. kg veiddan fisk, verður mælt til at hava óbroyttan.
10. Mælt verður til at avseta somu upphædd sum seinast. Annars verður víst til uppskot landsstýrisins um agnprísin, sum er til viðgerðar í løgtinginum.
11. Mælt verður til at hækka rakstrarstudningin frá 38 mió. kr. til 45 mió. kr. Hetta kemst av, at nakað meira verður helst fiskað av teimum fiskasløgum, sum fáa rættiliga stóran stuðul. Rakstrarstudningur pr. kg verður óbroyttur. Umframt verður mælt til

at geva 38 oyru fyri kg av svartkjafti, sum landaður verður til matna. Harvið kann avreiðingarprísurin lækkast frá 1,75 kr./kg til 1,25 kr./kg, meðan skipsparturin verður tann sami. Fyri eitt skip sum »Gullfinnur«, um hann fiskar 15.000 tons, vilja 19,7 mió.kr. vera til skipið, tá ið hýrurnar eru frádrignar, líka mikið um hann fær 1,75 kr./kg ella 1,25 kr./kg og 38 oyru í rakstrarstuðuli. Manningaparturin vil minka frá 375.000 kr. til 268.000 kr. Henda skipan vildi gjørt svartkjaftavinnuna 12 oyru/kg ódýrari.

12., 13., 14. Mælt verður til at hækka játtanina til frítíðarløn, fyrisæti og rentur frá 3,4 mió. kr. við 500.000 kr. til 3,9 mió. kr.

15., 16. Uppskot er gjørt um at broyta lógina um Ráfiskagrunnin soleiðis, at hann ikki bert er til at halda javnan avreiðingarprís yvir longri tíðarskeið, men eisini til at veita prísískoyti fyri ymisk fiskasløg. Hetta seinna hevur verið gjørt, men lógin fyri grunnin hevur ikki heimilað tí. Nú tiltaksgrunnurin er vorðin so mikið stórur (meira enn 40 mió.kr.), verður mett, at tað ikki er neyðugt við beinleiðis játtan til tiltaksgrunnin, men at tað, sum møguliga loypur av játtanini til Ráfiskagrunn I, fer í tiltaksgrunnin. Uppskotið til játtan II er nakað minni enn seinast, og kemst hetta mest av, at ein partur av ískoytinum, sum var ætlaður til svartkjaft, nú verður veittur sum rakstrarstudningur.

17. Mælt verður til at játta somu upphædd.

18. Her verður mælt til at lækka játtanina við 3 mió.kr. til 7 mió.kr., tí ein partur av tí, sum er nýtt av hesi konto í hesum árinum, er komið yvir á aðra konto, t.d. 40 oyru eyka fyri kg av ávísum djúpvatnsfiskasløgum.

19. Hesin peningur var seinasta ár goldin av játtanini undir pkt. 18.

20. Hetta er flutningsútreiðslur at flyta fisk frá plássum, har eingin fiskakeypari er, til fiskavirki.

1. viðgerð 3. mai. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 17. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 28. apríl 1983 og undir 1. viðgerð tann 3. mai 1983 beint í figgjarnevndina.

Uppskot landsstýrisins er í trimum pørtum:

I. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.
II. Uppskot til løgtingslóg um eykastudning til veiðu av ídnaðarfiski.
III. Uppskot til løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.

Samlaða stuðulsveitingin til fiskivinnuna er eftir fíggjarløgtingslóg 1983/84 kr. 203 mió., og eftir yvirliti viðlagt fyriliggjandi lógaruppskoti verður talið 202.575.000 kr.

Fíggjarnevndin hevur havt fundir við umboð fyri Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Útróðrarmanna, Felagið Trolskip, Felagið Ídnaðarskip og fyri saltfiskatrolararnar. Til fundirnar er útvegað ávíst taltilfar, og frá feløgum og umboðum, sum umrødd omanfyri, er útvegað ávíst taltilfar og givnar frágreiðingar um ymisk viðurskifti og útlit í vinnuni.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini av lógaruppskotinum heft seg við, at orsøk er til at gera onkrar broytingar, og er víst á, at í lógaruppskotinum §1, pkt. 2 hareftir §4, 2. pkt í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður skotið upp, at manningini á opnum báti verður tryggjaður minstaforvinningur, treytað av, at viðkomandi hevur havt minst 60% av skattainntøku síni stavandi frá útróðri í árinum fyri, og at hesin framhaldandi rekur somu høvuðsvinnu í ikki minni mát enn áður, er meirilutin í fíggjarnevndini av teirri áskoðan, at prosenttalið eigur at verða lækkað til 40%, og at reglan, um hesin fiskimaður framhaldandi rekur somu høvuðsvinnu í ikki minni mát enn áður, eigur at verða strikað.

Somuleiðis er víst á, at í §5, 2. stk. eigur flutningsstudningurin, sum í løtuni er 15 oyru/kg, at verða hækkaður til 20 oyru/kg.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) setir sostatt fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Í §1 verður pkt. 2, §4, 2. stk. orðað soleiðis:

»Manningini á opnum báti verður tryggjað ein minstiforvinningur av somu støddsum í 1. stk., treytað av at viðkomandi persónur hevur havt minst 40% av skattainntøku síni stavandi frá útróðri árið fyri.«

»Mandskabet på åbne både tilsikres også en mindsteindtægt af samme størrelse som i stk. 1, betinget af at vedkommende person har haft mindst 40% af sin skatteindtægt hidrørende fra hjemmefiskeri året i forvejen.«

Somuleiðis setir sami meiriluti (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til**

§5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

**§1.** Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd henda broyting: Í §5, stk. 2 verður í staðin fyri »15 oyru/kg« sett: »20 oyru/kg«.

**§1.** I lagtingslov nr. 22 af 18. mars 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændring: I §5, stk. 2 sættes i stedet for »15 øre/kg«: »20 øre/kg«.

**§2.** Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1983.

**§2.** Denne lov træder i kraft den 1. april 1983.

Í uppskoti landsstýrisins er í §1, pkt. 16 talið 1.400 HK ikki komið við í tekstinum til lógaruppposkotið, og verður tí sett fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins**

Í §1, pkt. 16 verður §6, 1. stk., síðsta pkt. orðað soleiðis:

»Fyri trolarar við høvuðsmaskinu uppá 1.400 HK ella har yvir verður studningurin ávikavist 43 oyru/kg og 80 oyru/kg.«

»For trawlere med hovedmaskine på 1.400 HK eller derover bliver tilskuddet henholdsvis 43 øre/kg og 80 øre/kg.«

Viðvikjandi uppskoti landsstýrisins um løgtingslóg um brenniolju-studning til fiskiskip er nevndin uttan Adolf Hansen samd um at broyta upphæddirnar og setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Í løgtingslóg um brenniolju-studning til fiskiskip verður § 1, 2. stk. orðað soleiðis:

»Fær skip brenniolju fyri lægri prís enn 2,50 kr./ltr., lækkar studningurin við 1 oyra fyri hvørji 5 oyru, prísurin á brenniolju er niðanfyri 250 oyru/ltr.«

»Såfremt et skip får brændselsolie til en lavere pris end 2,50 kr./ltr., formindskes tilskuddet med 1 øre for hver 5 øre, prisen på brændselsolie er under 250 øre/ltr.«

Viðvíkjandi uppskoti landsstýrisins til løgtingslóg um eykastudning til veiðu av ídnaðarfiski hevur fíggjarnevndin havt fund við formannin og skrivaran í nevndini, ið ásetir prís á ídnaðarfisk. Útvegaðar vóru frágreiðingar, og handað varð ávíst taltilfar.

Minnilutin (Ove Mikkelsen), ið er av teirri áskoðan, at lógin eisini skal fevna um ídnaðarfisk, ið veiddur verður á føroyskum sjóøki, setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Í § 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis:

»Tá ið fiskur, ið veiddur er í føroyskum, russiskum, norskum ella norðsjóarøki, verður landaður til ídnað í Føroyum, verður til føroyskt fiskifar latið í eykastudningi 12 oyru/kg.«

»Ved landing af fisk, der er fanget i færøsk, russisk, norsk ella nordsøområde til industri på Færøerne, ydes til færøsk fiskefartøj i ekstra tilskud 12 øre/kg.«

Til omanfyri nevndu uppskot og broytingaruppskot hevur meirilutin (IvanJohannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen) soljóðandi viðmerkingar:

Sum kunnugt eigur ráfiskagrunnurin strangt tikið ikki at seta hægri avreiðingarprís, enn avrokningarprísirnir loyva. Avreiðingarprísirnir eiga strangt tikið at verða tað sama sum ein útjavnaður avrokningarprísur. Í veruleikanum skuldi eingin játtan verið neyðug til ráfiskagrunnin.

Hóast hetta hevur løgting/landsstýri á hvørjum ári veitt ráfiskagrunninum munandi upphædd.

Hesa upphædd hevur nevndin fyri ráfiskagrunnin eftir besta førimuni býtt út á tey ymisku fiskasløgini. Grundgevingin fyri hesa útbýtan hevur verið ymisk, og ongar fastar rætningslinjur hava verið. Talan hevur ofta verið um semjur, tí nevndin skal í veruleikanum ikki hugsa um veiðuhættir, inntøkuviðurskifti og onnur viðurskifti, sum verða tikin við.

Hjálagda uppskot hevur til endamáls at bøta um hesi viðurskifti. Eftir uppskotinum skal nevndin

1) áseta avreiðingarprísir so neyvt við avrokningarprísirnar sum møguligt (soleiðis sum tað í veruleikanum eigur at vera).
2) áseta stuðul ella avgjald á avreiðingarprísirnar við grundgeving, sum nevndin fær heimild at nýta (soleiðis sum hon í dag veruliga ger).

Afturat hesum verða minstuprísirnir ásettir fyri øll fiskasløg, sum eru undir áseting (hóast stødd og góðska eru annarleiðis, enn sett er av nevndini).

Í uppskotinum verður játtanin veitt í tveimum (fyriuttan møguliga játtan til tiltaksgrunn). Ein minni partur verður veittur til at tryggja javnar avreiðingarprísir, og ein annar (í fyrstani væntandi størri) partur verður veittur nevndini at býta út á tey ymisku fiskasløgini í fíggjarárinum. Møguliga skuldi játtanin til grunnin verið í enn fleiri pørtum fyri at tryggja ávís endamál (t.d. so sum 10 mió.kr. til svartkjaft + 2 mió.kr. til B-fisk) o.s.fr.

Í §4, 3. stk. eru grundgevingar (reglur) fyri ásetan av stuðuli/avgjaldi ásettar. Í uppskotinum kann nevndin, út frá metingum um, hvussu fiskastovnarnir eru fyri, áseta stuðul/avgjald á avreiðingarprísirnar. Nevndin kann, um hon ynskir tað, seta ymiskan stuðul á fyri ymiskar fiskihættir. Hon kann áseta reglur um góðsku og krøv til hagreiðingarhættir (kassar t.d.), fyri at veiðan kann fáa ávísa studningsupphædd v.m.

Í §11 verður skotið upp, at heimild verður til at krevja, at internur roknskapur skal fyrivísast, tá hetta verður kravt. Hetta út frá tí, at tað er torført at meta um, hvørjar upplýsingar nevndin kann fáa til vega, og tí at nevndin hevur fingið blankt noktað hesum frá ávísum sølufeløgum.

Meirilutin setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot til**

**løgtingslóg um ráfiskagrunn.**

§1. Í løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum nýtt §1, 3. stk. verður sett:

»Ráfiskagrunnurin hevur haraftrat til endamáls at veita stuðul til ávikavist leggja avgjald á avreiðingarprísir, jbr. §4, 3. stk.«

2. §3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

»At sita fyri grunninum at áseta avreiðingarprísin/stuðul ávikavist avgjøld og at áseta avrokningarprísin millum grunnin og fiskavirkir verður sett 7-manna nevnd, vald soleiðis:

**lagtingslov om råfiskefond.**

§1. I lagtingslov nr. 15 af 5. maj 1975 foretages følgende ændringer:

1. Som ny §1, stk. 3 sættes:

»Råfiskagrunnurin har desuden til formål at fastsætte støtte til henholdsvis lægge afgift på indhandlingspriser, jfr. §4, stk. 3.«

2. §3, stk. 1 affattes således:

»Til at administrere fondet, til at fastsætte indhandlingsprisen/støtte henholdsvis afgift og til at fastsætte afregningsprisen mellem fondet og virksomheder til tilvirkning af fisk nedsættes et 7-mandsudvalg, der bliver valgt således:

1) Útróðrarfeløg velja 1 lim og 1 varamann,

2) Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim og 1 varamann,

3) Ráfiskakeyparar velja 2 limir og 2 varamenn,

4) Landsstýrið tilnevnir 3 limir, harav 1 er fiskifrøðingur, og 3 varamenn, allir óheftir av fiskivinnuni.

5) Hesir 7 limirnir í felag velja 1 formann og 1 varamann, báðir óheftir av fiskivinnuni. Fæst ikki fleirtal fyri vali, verða teir uppnevndir av sorinskrivaranum. Stendur á jøvnum í atkvøðugreiðslu annars, er formansins atkvøða avgerandi.«

**3.** Sum nýtt §4, 3. stk. verður sett:

»Grundað á eina meting av, hvussu teir einstøku fiskastovnarnir eru fyri, ávirkanin, stuðulsskipanin sum heild hevur á spjaðingina av fiskiskapinum, og við tí setningi at varðveita fiskastovnarnar á eini legu, ið gevur størstu úrtøkuna eftir einum langtíðarsjónarmiði, áseting nevndin stuðul til ávikavist avgjald á avreiðingarprísin.«

1) Foreningen af hjemmefiskere vælger 1 medlem og 1 suppleant.

2) Føroya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant,

3) Ráfiskekøbere vælger 2 medlemmer og 2 suppleanter,

4) Landsstyret udpeger 3 medlemmer, heraf 1 fiskeribiolog og 3 suppleanter, alle uafhængige af fiskerierhvervet.

5) De nævnte 7 medlemmer vælger i fællesskab en formand og suppleant, begge uafhængige af fiskerierhvervet. Opnås der ikke flertal for valg, udnævnes disse af sorenskriveren. Ved stemmelighed iøvrigt er formandens stemme afgørende.«

3. Som nyt §4, stk. 3 sættes:

»På basis af en vurdering af de enkelte fiskebestanders størrelse og beskatning, den samlede støtteordnings indvirkning på fiskeriets fordeling og med den målsætning at dirigere fiskeriet i den retning, at fiskebestandene bevares på det niveau, der ud fra en langtidsbetragtning giver det største udbytte, fastsætter udvalget støtte til henholdsvis afgift på indhandlingsprisen.«

**4.** §5, stk. 1, 2 og 3 verða orðað soleiðis:

»Ráfiskakeyparar avrokna til ráfiskaseljarar avreiðingprísin, íroknað stuðul ávikavist avgjald, ið nevndin ásetir sambært §4, 1. og 3. stk.

*2. stk.* Um avrokningarprísurin sambært §4, 2. stk. er lægri enn avreiðingarprísurin, íroknað stuðul/avgjald, verður munurin at rinda ráfiskakeypara úr grunninum.

*3. stk.* Um avrokningarprísurin sambært §4, 2. stk. er hægri enn avreiðingarprísurin, íroknað stuðul ávikavist avgjald, verður munurin at rinda frá ráfiskakeypara til grunnin.«

**5.** §6 verður orðað soleiðis:

»Avreiðingarprísurin, íroknað stuðul ávikavist avgjald, eftir §4, 1. og 3. stk. eftir hesi lóg verða at seta fyrstu ferð fyri tíðarskeiðið 1. juni 1983 til 30. september 1983 og víðari fyri 4 mánaðir í senn.«

*2. stk.* Nevndin hevur skyldu at áseta prísirnar og stuðul ávikavist avgjaldsupphæddirnar ikki seinri enn 10. í mánaðinum, áðrenn nýtt tíðarskeið byrjar, fyrstu ferð tó ikki seinri enn 25. mai 1983. Prísirnir íroknað stuðul ávikavist avgjald verða skjótast gjørligt at kunngera í Útvarpi Føroya og í føroysku bløðunum.

**4.** §5, stk. 1, 2 og 3 formuleres således:

»Købere af råfisk afregner til råfiskesælgere indhandlingsprisen, iberegnet støtte henholdsvis afgift, som udvalget fastsætter i henhold til §4, stk. 1 og 3.

*Stk. 2.* Såfremt afregningsprisen i henhold til §4, stk. 2 er lavere end indhandlingsprisen, iberegnet støtte/afgift, betaler fondet råfiskekøberen forskellen.

*Stk. 3.* Såfremt afregningsprisen i henhold til §4, stk. 2 er højere end indhandlingsprisen, iberegnet støtte henholdsvis afgift, betaler råfiskekøberen forskellen.«

**5.** §6 affattes som følger:

»Indhandlingsprisen, iberegnet støtte/henholdsvis afgift i henhold til §4, stk. 1 og 3 i henhold til denne lov fastsættes første gang for perioden 1. juni 1983 til 30. september 1983 og derefter for 4 måneder ad gangen.

*Stk. 2.* Udvalget skal fastsætte priserne og støtte henholdsvis afgiftsbeløbene ikke senere end den 10. i måneden inden påbegyndelsen af en ny periode, første gang dog ikke senere end den 25. maj 1983. De fastsatte priser iberegnet støtte henholdsvis afgift offentliggøres snarest i Útvarp Føroya og de færøske aviser.

*3. stk.* Undir serliga munandi broytingum í gjaldoyrisella søluviðurskiftunum kann nevndin, treytað av góðkenning landsstýrisins, taka teir lýstu avreiðingarprísirnar, íroknað stuðul ávikavist avgjald, upp til nýggja viðgerð, sjálvt um tíðarskeiðið ikki er úti, og áseta nýggjar avreiðingarprísir, íroknað stuðul ávikavist avgjald, fyri tað, sum eftir er av tíðarskeiðinum. Í heilt serligum førum kann landsstýrið áleggja nevndini at endurskoða teir lýstu avreiðingarprísir, íroknað stuðul ávikavist avgjald.«

*Stk. 3.* I tilfælde af indtrufne særlig store ændringer i valutaforholdene og salgsbetingelserne kan udvalget under forudsætning af landsstyrets godkendelse tage de offentliggjorte indhandlingspriser iberegnet støtte henholdsvis afgift til ny behandling, selv om perioden ikke er udløbet, og fastsætte nye indhandlingspriser iberegnet støtte henholdsvis afgift for den resterende del af perioden. I ganske særlige tilfælde kan landsstyret meddele udvalget pålæg om at tage de offentliggjorte indhandlingspriser, iberegnet støtte henholdsvis afgift op til ny behandling.«

**6.** §10, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Ásettu avreiðingarprísirnir, íroknað stuðul til ávikavist avgjald eru minstuprísir fyri fyrstafloks fullblóðgaðan fisk; sild og kongafiskur krevjast tó ikki blóðgað.«

6. §10, stk. 1 formuleres således:
»De fastsatte indhandlingspriser iberegnet støtte henholdsvis afgift er mindstepriser for strubeskåret fisk af første sortering; sild og rødfisk dog ikke strubeskåret.«

**7.** §11, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Allir, sum hava við útflutning av fiskavørum úr Føroyum at gera, hava eftir kravi frá nevndini ella kærunevndini skyldu til at geva allar upplýsingar prísviðurskiftunum, eksportvørum og framleiðsluútreiðslunum viðvíkjandi. Um tað verður kravt, skal internur roknskapur

7. §11, stk. 1 formuleres således:
»Enhver, som medvirker ved eksport af fisk fra Færøerne, har pligt til på begæring af nævnet eller ankenævnet at meddele alle oplysninger vedrørende prisforhold, eksportvarer og produktionsomkostninger. Såfremt der sættes krav herom, skal interne regnskaber forelægges.«

fyrivísast.«

§2. Henda lóg kemur í gildi 1. juni 1983.

§2. Denne lov træder i kraft den 1. juni 1983.

Minnilutin (Atli Dam) vísir á, at fyriliggjandi uppskot um býtið av teim 203 mió. kr., avssettar eru á fíggjarlógini til stuðulsskipanina til fiskivinnuna, í mun til undanfarin ár í høvuðsheitum merkir eina lækkan av brennioljustudninginum við 15 mió. kr., sum síðan verða býttar út á aðrar tættir — her serliga rakstrarstudningurin — í teirri stuðulsskipan, undanfarna samgonga bygdi upp árini 1975-80.

Hin fráboðaða nýskapan, sum serliga Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin søgdu seg eiga lykil til, er sostatt framvegis goymd hjá hesum flokkum. Minnilutin heldur, at hetta er spell, tí tað stendur minnilutanum greitt, at galdandi stuðulsskipan hevur síni lýti. Hóast Javnaðarfloksins luttøka í upprunaliga lógarsmíðinum borgar fyri, at skipanin er toluliga skilagóð, so stendur eftir, at lógirnar eru smíðaðar til viðurskiftini, ið valdaðu 1979 til 1980, og eru munandi broytingar hendar síðani.

Tí hevði verið gott, um løgtingið kundi sloppið at sammett fyriliggjandi uppskot við tey Columbusegg, sum Sambands- og Sjálvstýrisflokkurin enn hava til klekingar. Tá ikki er brostið fyri nev eftir hesa drúgvu tíð, áttu hesir flokkar at kanna eftir, um eggini ikki skuldu verið ótroðin.

Eitt høvuðssjónarmið, ið lagt varð til grund fyri upprunaligu skipanina, var, at eitt vælrikið meðalskip skuldi greiða skyldur sínar, og at tryggjast skuldi lægstu manningarbýrunum ein vøkstur, so tær betur samsvara inntøkuni við øðrum skipum og í ríminligum lutfalli við arbeiði uppi á landi, tá hugsað verður um arbeiðstíðina. — Minnilutin heldur ikki, at uppskot landsstýrisins ella meirilutans í ríminligt mát hava mett um hesi viðurskifti út frá galdandi veiðu-, pris-, útreiðslu- og rentabilitetsviðurskiftum. Uppskotini eru í meira mun merkt av einstaklinga áhugamálum hjá onkrum limum samgongunnar ella fíggjarnevndarmeirilutans. Hetta er samsvarandi tann V & K politikk, sum alt meira gjøgnumsúrgar øll okkara samfelagsviðurskifti.

T.d. er eyðsæð, at tørvur er á ábótum til teir línuveiðumenn, sum eru á saltfiskaveiðu vestanfyri, nú kvoturnar eru minni, fiskiskapurin verri og prísurin lækkandi, men her hevur verið talað fyri deyvum oyrum í fíggjarnevndini.

Tað er ikki samsvar millum tann stuðul, veittur verður trolarum,

sum bert royna undir Føroyum, og trolarum við íslandsloyvi. Meðan hesir fyri tveimum árum síðani kundu veiða 1500-2000 tons í part undir Íslandi, er kvotan skorin niður í 750 tons, sum eru munandi dýrari at veiða sambært nýggju fyriskipanunum um veiðu á vesturlandinum, tað er tí lítið hóskandi, at hesir bátar eru teir einastu, sum harafturat fáa stuðulsveitingina niðurskorna. Tað hevði verið reiðiligari beinleiðis at tikið íslandsloyvið frá hesum bátum enn at royna at pína teir til at fara undir Føroyar eftir 1 1/2 - 2 milliónum krónum í studningi, sum teir vildu fingið afturat, um veiðumynstur teirra varð hitt sama sum djúpvatnstrolaranna undir Føroyum.

Tað er serliga í hesum tilmæli samgongunnar, at einstaklingaáhugamálini koma til sjóndar.

Tær fyriskipanir, skotnar eru upp viðvíkjandi ídnaðarveiðuni, samvirka á ongan hátt, og tí kann ikki spyrjast tann vøkstur í ídnaðarveiðu burturúr, sum er ynskjandi, skulu ikki allar kvoturnar í sáttmálum við útlond framhaldandi verða pappírskvotur.

Heldur ikki fremur galdandi stuðulsskipan til ídnaðarveiðu saman við uppskotna eykastudninginum á nakran hátt ta rationalisering á landi, sum er neyðug, skal ein líkinda prísur kunna fáast við landing í Føroyum. Her má tíverri ásannast, at tann óbeinleiðis stuðul, sum nú í mong ár hevur verið latin til lýsi- og mjølframleiðslu í Føroyum tykist hava verið latin til fánýtis. Tær umleið 70 mió. kr., sum lagdar eru í víðkan av viðgerðarorkuni á landi úr 6-700 tonsum/dag til 11-1200 tons/dag tykjast ikki at hava økt kapasitetin, síðan bátar okkara mugu bíða upp í 6-8 dagar eftir landingartørni.

Tí skjýtur minnilutin upp eina nýggja eindarskipan fyri stuðul til ídnaðarveiðu at galda hetta fíggjarárið. Hon verður so at endurskoða komandi ár. Eftir hesi skipan verður stuðul uppá 9 oyru/kg veittur uttan mun til, hvar veitt er, og hvar landað verður, og uttan mun til prís. Afturat verður latið ískoyti uppá 5 oyru við landing í Føroyum, ætlað sum flutningsískoyti.

Spurningurin um virkisrentabilitet og effektivitet verður so ein beinleiðis spurningur millum virki og landsstýri/løgting. Hetta vil óivað verða sunnari forrætningsgongd enn tann »látan sum um« liberalisman, sum fleiri av okkara vinnulívspávum ynskja at virka undir.

Við at avtaka »gradueraðu« studningsskipanina og prísásetingarskipanina sum sektar bátar við góðum fiski — teir missa, sum er, prísískoytið — og letur bátum við ringum fiski virðisløn — teir fáa hægri studning — og í staðin gera studningin generellan í eitt ár, og við at lata oljustudningin standa við í ávísan mun, hóast bátar útvega sær

bíligari olju uttanlands, fær íðnaðarveiðan eina slíka innspræning, at hugurin til at økja hana skuldi vaksið. Samstundis skuldi hetta elvt til eitt ávíst trýst á oljuprísin í Føroyum, so hesin kom í betri samsvar við lækkaða prísin uttanlands.

Meirilutin leggur fram uppskot um broyting í lógini um ráfiskagrunn.

Tað er eyðsæð, at hetta uppskot ikki er smíðað av meiriluta fíggjarnevndarinnar, men av landsstýrinum, ið óvist av hvørji orsøk ikki sjálvt hevur ynskt at leggja uppskot fram. Harvið er sloppið undan at geva málinum 1. viðgerð í tinginum og frágreiðing um ætlanina við uppskotinum. Tá so viðgerðin í fíggjarnevndini hartil hevur verið lítil og ófullfíggjað, er ilt at meta um veruligu ætlanina við uppskotinum og avleiðingarnar av tí.

Minnilutin sær seg tí ikki føran fyri at taka endaliga støðu til hetta uppskot, fyrr enn tingviðgerðin og møguliga ein eftirfylgjandi nevndarviðgerð hevur verið.

Hóast minnilutin sambært omanfyri standandi hevur týðandi atfinningar til uppskot landsstýrisins, ásannar minnilutin, at ávísir batar eru fyri onkra vinnugrein í uppskotinum. Hesum tekur minnilutin undir við.

Eisini skal viðmerkjast sum nakað skilagott í uppskotinum, at fleiri av teim tilmælum, sum Javnaðarflokkurin hevði í fjør, í ár fáa undirtøku frá meirilutanum.

Hugsanini um at tryggja monnum, sum rógva út við opnum báti, minstaforvinning, kann minnilutin taka undir við, men tó ikki við at seta inntøkumark uppá 60% ella 40% sum treyt, tí hetta tekur allar møguleikar fyri at veita minstaforvinning burtur aftur, og so má uppskotið metast at hava verið framsett uppá kvamsvís. Tað tykist, sum ræðsla fyri einum misbrúki, sum bert kann blíva minimalt — tí opnabátaveiðan snýr seg allarbestu árini um hægst 4-5000 tons — hevur elvt til hesi %-mark, sum gera, at lógin ongantíð kemur í nýtslu, umframt tað, at hon vildi gjørt mannamun beinleiðis ímillum menn á sama báti.

Tað átti at verið nóg mikið, at lønjavningargrunnurin kann útvega sær frásøgn frá kommunu, sýslumanni ella virki um, at hann, ið avreiðir, nýtir munandi part av arbeiðstíð síni á útróðri. Við munandi part hugsar minnilutin um 10-20%.

Broytingaruppskot minnilutans hava ein ávísan meirkostnað við sær innan fyri einstøku greinirnar, men minnilutin metir, at ein um-

fordeiling ímillum teir 20 tættirnar í stuðulsskipanini vildi gjørt, at samlaði kostnaðurin kundi greiðast við teim 203 miliónunum, t.d. kann nakað skerjast í petti 17 og 18.

Minnilutin setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

**1.** §3, 1. punktum: Í staðin fyri »kr. 9.050,00« verður sett: »kr. 9.350,00«.

**2.** §4, 2. punktum, 3. stk. verður orðað soleiðis:
»Treytin fyri, at minstiforvinningur kann veitast, er, at útróður gevur/ella kann geva munandi part av ársinntøkuni hjá viðkomandi persóni.«

**4.** §5, 1. stk., pkt. b.
á skipi við línu, gørnum, snøri ella snellu í saltfiskaveiðu 75 oyru/kg saltfisk uppvigað vekt.

**15.** §6, 1. stk., pkt. c.
Í staðin fyri »8 oyru/kg.« verður sett: »36 oyru/kg.«, og í staðin fyri »47 oyru/kg.« verður sett: »73 oyru/kg.«

**21.** Í §7, pkt. a verða orðini: »Sum ikki koma undir fyrisetningarnar í §6, 1. stk., pkt. c« strikað.

**Broytingaruppskot**
**til**

lógina um studning til fiskaveiðu í staðin fyri uppskot landsstýrisins um eykastuðul og í staðin fyri upprunalógina.

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um studning til veiðu av iðnaðarfiski.**

**§1.** Tá ið fiskur verður landaður til iðnað í Føroyum, verður til føroyskt fiskifar latið í studningi 14 oyru/kg. Tá fiskur verður landaður til iðnað uttanlands,

**lagtingslov om tilskud til fangst af industrifisk.**

**§1.** Da fisk landes til industri på Færøerne, ydes til færøsk fiskefartøj i tilskud 14 øre/kg. Når fisk landes til industri i udlandet, ydes til færøsk fiskefartøj

verður til føroyskt fiskifar latið í studningi 9 oyru/kg.

Studningurin verður at býta millum manning og skip sambært sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag.

§2. Studningsskipanin verður fyrisitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§3. Henda lóg fær gildi 1. aprfl 1983, og fer lóg nr. 14 frá 5. mai 1975 við seinni broytingum úr gildi 17. mai 1983.

9 øre/kg. i tilskud.

Tilskuddet deles mellem mandskab og skib i henhold til kontrakt mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening.

§2. Støtteordningen administreres af Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna.

§3. Denne lov træder i kraft 1. april 1983, og lov nr. 14 af 5. maj 1975 med senere ændringer træder nd af kraft 17. maj 1983.

Við í uppskoti landsstýrisins er ætlaður stuðul til fiskiroyndir á fremmandum høvum.

Vandi er fyri, at landsstýrið treytaleyst letur henda studning til privatar at umsita uttan trygd fyri skilagóðari nýtslu.

Fyrr í hesi setu hevur landsstýrið havt uppskot um veðhald fyri lánum til virksemi uttan fyri Føroyar, eitt nú í Føroyingahavnini.

Tá helst meiriluti var fyri ávísum treytum í sambandi við hetta veðhald, setir minnilutin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyklar**

Landsstýrinum verður álagt í tingsetuni 1983/84, men innan 1. december 1983, at leggja fram fullfíggjaða frágreiðiug uni virksemið í Føroyingahavnini og lógaruppskot, sum fær ognarviðurskiftini viðvíkjandi Nordafar-virkinum umskipað so, at atkvøðurætturin viðvíkjandi viðurskiftum felagsins kemur at liggja har, sum ábyrgdin nú liggur, nevniliga hjá Føroya Løgtingi.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) førir fram:
Í øllum hesum drügva lógaruppskoti er bert talan uni at taka nøkur

oyru frá einum veiðuhátti og lata til ein annan, av tí at samlaða stuðulsupphæddin er fastløgd.

Hví allir veiðuhættir hava landsstuðul fyri neyðini, er eingin tanki gjørdur um. Men við at gjøllari kanna hetta lógaruppskot sæst skilliga manglandi vilji at viðganga tann lívsneyðuga tørvin á neyvari landsstýring á øllum tí, sum eitur føroysk fiskivinna.

At her er bráðneyðugt at lóggeva og við skilagóðari reglugerð viðvíkjandi uppbýti av veiðuøkjum til ávísar veiðuhættir til ávísar tíðir, soleiðis at lív verður lagað øllum okkara ymisku veiðuførum og veiðuhættum. Og soleiðis, at fiskivinnan kann koma at hvíla í sær sjálvum innan stutt avmarkað áramál uttan beinleiðis almennan studning fyri kilo veiddan fisk, olju- og annan beinleiðis studning í hundrað millióna tali hvørt einasta ár. Og harumframt almenna kreppu- og serhjálp í líka stórari upphædd árliga til største partin av flotanum, fyri at hann ikki skal fara av knarvanum.

Um førdur varð ein miðvísur og skilagóður fiskivinnupolitikkur her á landi, eins og hevur verið galdandi í nógv Harrans ár hjá øllum fiskivinnutjóðum, er eingin ivi um, at vit uppá ikki so langt sikt megnaðu at fáa okkara fiskivinnu sum heild at bera seg, hvíla í sær sjálvum, uttan stórvegis almennan stuðul av nøkrum slag. Soleiðis at fiskimenn óansæð veiðuhátt fingu eina sámiliga ársinntøku, at skip, bátar og virki komu at bera seg, og ikki minst, at vit miðvíst vórðu førir fyri innan stutta tíð tó at uppbyggja fiskastovnarnar upp til at tola eina munandi større veiðu.

Hetta ásanna allir fiskimenn og óivað allir politikkarar eisini, men higartil eru vit bert náddir til tos og yvirhøvur onga handling. Lata bert standa til og lata hvønn sæta sær, sum best ber til, og harvið máa alt fíggjarligt støði undan vinnuni, alt meðan valdandi ruðuleiki á fiskiøkinum bert versnar og versnar.

Allir tingmenn ásanna t.d., at útróðrarflotin sum heild er sera illa fyri. Men studningur aleina hjálpir eingki, og kreppulán er bert steinar oman á byrðu.

Tað, útróðrarflotanum tørvar aframest, og sum hann biður um, er virkisøki og veiðunáðir uttan ágang av troli ella øðrum reiðskapi. Varð hesum teirra ynski gingið á møti, er eingin ivi um, at útróðrarmenn kunnu vinna sær eina sámiliga ártøku, eins og bátirnar blivu førir fyri at fóta sær aftur fíggjarliga.

Men ongantíð sum fyrr eru yvir hesi seinastu 2 árini trokaðir so nógvir trolarar av ymiskari stødd og slag inn á tað grunna vatnið, og hóast ávíst innflutningsbann hevur verið í gildi. Tann vánaleysa veiðustøðan, útróðrarflotin er í, er eisini galdandi fyri línuflotan sum

heild. Nú partrolararnir eru við at gera um seg, fáa lemmutrolararnir heldur ikki náðir at royna o.s.fr., so ruðuleikin við ymiskum veiðuførum og -hættum á teim heilt nærru grunnunum nærkast tí ruðuleika, sum var við Lofoten, har menn máttu verja sín reiðskap við skørpum riflum, alt meðan vit á tingi bert sova.

Í staðin fyri at ávíst tann partin av trolflotanum, sum hevur nóg stóra maskinorku, út á djúpari vatn, eins og latið munandi almennan stuðul til teir trolarar, sum við rímiligari umvæling ella umbygging av slíkum førum, sum eru hóskandi til fiskivinnu á djúpum vatni, og harvið tynt út í tí alt ov stóru verandi veiðiorku og veiðitrýsti, sum er á grunnum vatni, samstundis gjøgnum almenna veiðustýring at borið so í bandi, at ung- og gýtingarfiskur varð vardur mest møguligt, soleiðis at nú ovfiskaðir stovnar kundu komið fyri seg aftur, og samstundis harvið økt munandi um veiðunøgdina pr. bát, manning, hátum, skipum og virkjum og ikki minst landsins fíggjarstøðu til ovurhonds stóran bata.

Um haraftrat varð so stílað fyri, at avreiðingarprísur eina mest varð goldin eftir góðsku, jú betri fisk, jú hægri prís, enn í dag, eins og góðskumetanin var eins yvir alt landið, hvat hon langt ífrá kann sigast at vera, hevði hetta gjørt, at vit framleiddu eina til allar tíðir framúrskarandi søluvøru og harvið sluppu undan teim sølutrupulleikum, vit í dag svíða fyri.

Vórðu nevndu tiltøk sett í verk við skili, so vildi øll veiða — frá snelluveiðu til trolveiðu — verið ein lønandi vinna, og um stutta tíð, so høvdu vit ikki brúk fyri hesari stuðulslóggávu, sum fyriliggur her í dag.

Alt, sum krevst til at venda verandi skeivu gongd, er viljin. Viljin at broyta til tað betra. Tí allir tingmenn mugu í dag ásanna, at tað ber ikki til at blíva við at sita hendur í favn og bert lata standa til, meðan studningurin til vinnuna støðugt veksur okkum upp um høvdið, samstundis sum fleiri av okkara bestu og týðandi fiskastovnum týnast alt meir og meir.

Sostatt áttu vit allir tingmenn nú í tøkum tíma at tikið saman hendur tvørtur um øll politisk mørk og lit og uttan at spilla evnir og tíð í ógagnligum briksli um farnar og gjørdar syndir á hesum øki.

Sostatt loyvi eg mær at seta fylgjandi uppskot til samtyktar fram soleiðis, at hetta fyri tjóðina alttýðandi mál kann koma á tingborð og harvið geva tingmonnum høvi til í friði og náðum sakliga og sera gjølla viðgera málið um stuðulsskipanina sum heild eins og neyðug tiltøk til at minka um hesa stóru útreiðslu. Tí sjálvandi vilja vit allir bæði fiskimonnini og fiskivinnuni sum heild alt tað besta, og er tað

eingin ivi um tað. Spurningurin er bert at finna saman á tingi og finna fram til loysnir og tiltøk, sum bert koma Føroya fólki og landi at gagni.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

viðvíkjandi lógartiltøkum og reglugerðing fyri fiskivinnu á landleiðini.

Løgtingið áleggur landsstýrinum í samrað við fiskivinnuráðið og fiskifrøðingastovnin at leggja fyri tingið fyrst í ólavsøkutingsetuni uppskot um ávísa stýring av fiskiskapi á landleiðini, har miðað verður ímóti at lætta um veiðutrýstið á tí grunna vatninum, økja um alla veiðu á djúpum vatni, mæla til avmarkan av ávísum veiðuhættum á ávísum økjum til ávísar árstíðir, soleiðis at allir veiðuhættir sær fáa mest møgulig veiðulikindi uttan óneyðugar ónáðir frá øðrum veiðuhættum, eins og mæla til, at ávís tiltøk verða sett í verk til at verja um smá- og ungfiskin.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) er sum heild ósamdur við tí førda politikkinum um, at fiskivinnan á sjónum, sum er fyrsta lið í framleiðslu- og søluketuni, hevur stuðul fyri neyðini.

Men orsakað av manglandi evnum og vilja innan meirlutan at rætta hesa mannminkandi órættvísi hevur minnilutin valt at meta stuðulsskipanina sum eina afturbering fyri ov nógv tikið. Og annað er henda skipan ikki.

Stuðulsskipanin eigur at gerast meira rættvís, soleiðis at hon

1) ikki bert verður ein premia, har lagt verður omaní, har nokk er frammanundan, men
2) heldur ikki heldur lív í vinnutólum, sum samfelagsfiggjarliga eingi bein hava at standa á,
3) eggjar til ídni og sparsemi,
4) hjálpir teimum, sum fyribils ikki eru so væl fyri orsakað av fiskaloysi, manglandi kvotum, prísføllum og av líknandi umstøðum,
5) ikki revsar dugnaskap, og
6) at hon er skjóttvirkandi.

Minnilutin metir, at landsstýrið longu nú eigur at umhugsa eina meira rættvísa og minni mannminkandi forfordeiling av samfelagságóðanum.

Minnilutin er greiður yvir, at løgdu fiskiskipini ikki fiskin uppa

land í Føroyum, so hevði verið lítið arbeiði á landi, men minnilutin er samstundis greiður yvir, at so hevði okkara fiskivinna á sjónum verið betur fyri fíggjarliga og tað uttan nakran sum helst stuðul, men tó við eitt sindur øðrvísi støddarbýti skipanna millum. Hetta sigur okkum, at tað ikki er hjá okkara fiskivinnu á sjónum, at orsøkirnar til tann manglandi rentabilitetin skulu finnast.

Harafturat kemur, at verandi órættvísa umfordeiling førir við sær, at vinnutól, sum áttu at støðgað, verða gangandi, og at vinnutól, sum áttu at gingið, støðga, og at vandi er fyri, at fløgurnar, sum verða gjørdar undir galdandi stuðulsskipan, ikki høvdu verið rentablar, um eingin stuðulsskipan var galdandi, ella við øðrum orðum: vandi er fyri, at vit undir galdandi stuðulsskipanarlóggávu koma at gera íløgur, sum ikki eru samfelagsrentablar.

Á løgtingsfíggjarlógini er samtykt at afturbera fiskivinnuni á sjónum 203 mill. kr., harav 10 mill. kr. tó skulu nýtast til ymsi sekunder áhugamál. Tað kann soleiðis ikki henda ein umfordeiling, sum gevur onkrum meira enn ætlað av landsstýrinum, uttan so at ein annar fær minni. Møguligar batanir til summar bólkar megu tí samanlagt haldast innan fyri nevndu 10 mill. kr., um einki skal takast frá øðrum bólki.

Út frá tí, ið omanfyri er ført fram, og innan fyri rammurnar av játtanini á løgtingsfíggjarlógini vil minnilutin seta fram 6 broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins við fylgjandi viðmerkingum:

1) Tað er prógvað, at ein snelludagur er sum tveir arbeiðsdagar ella í meðal 16 tímar, og hartil kemur. at ein arbeiðsdagløn er ikki tað sama sum 1/30 mánaðarløn, men harafturímóti 1/20 mánaðarløn, og vil ein rættvís minstaforvinningsdagløn fyri snellu og línu tí vera $9.050/20 \times 2 = 905$ kr.

2 og 3) Saltfiskaprísirnir eru falnir við umleið 25% síðan seinasta heyst, og verður tað tí ilt hjá manningunum á saltfiskatrolarum og línubátum at kunna svara hvørjum sítt uttan eina hampiliga afturbering. Trolaramanningarnar hava í løtuni onga afturbering, meðan manningarnar á línubátunum hava 50 oyru. Báðir bólkar verða at hækka við 50 oyrum/kg.

4 og 5) Landsstýrisins restriktiónir um, hvar og nær veiðast kann í Íslandi, hevur ført við sær stóran inntøkumiss fyri teir, sum hava trolloyvi í Íslandi.

6) Ásannast má, at olja í landshúsarhaldinum figurerar sum ein innflutningur uttan mun til, um oljufeløgini innflyta hana, ella skipini keypa hana uttanlands. Uttan mun til, hvat tað skal kosta inni í landshúsarhaldinum í afturbering, so er tað ein fyrimunur lands-

økonomiskt at elva skipaeigarum at keypa oljuna, har hon er bíligast. Við at lata studningin falla burtur fyri tey skip, sum kunnu fáa ódýra olju uttanlands, elva vit monnum til líkasælu í staðin fyri sparsemi, samstundis sum vit vaksa um innflutningstølini. Lógin hevur verið uppbygd soleiðis, sum um vit sjálvi framleiddu oljuna og tí við lógum skuldu deinmað uppfyri, at sum fæstir fóru uttanlands at keypa olju. Hetta mynstrið kundi kanska verið nýtt til at verja um tær vørur, vit sjálvi framleiða.

Minnilutans broytingaruppskot eru fylgjandi:

Fyri at verja um arbeiðið á teimum smáu plássunum, sum hava flakavirki, og sum altíð eru útsett fyri, at skipini verða seld ella bara flyta til tey større plássini, setir minnilutin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya Løgtings áleggur landsstýrinum við gildi frá 15. juni 1983

1) at luta fiskiloyvini (serloyvini) soleiðis, at tað frammanundan verður uppgivið, hvørji kommunu landast skal í,

2) at ikki má landast aðrastaðni uttan loyvi frá kommunustýrinum í teirri kommunu, sum nevnd er í loyvinum,

3) at gera reglur um, at verður skip selt ella flytur til aðra kommunu, so fylgir loyvið ikki við, uttan so at kommunustýrið frásigur kommununi kvotuna við teirri motivering, at eingin í kommununi hevur ætlanir um at útvega sær skip í staðin fyri tað ella tey, sum fara úr kommununi.

4) at hava landingartølini fyri tær ymsu kommunurnar seinastu 3 árini sum grundarlag undir kvotabýtinum millum kommunurnar.

I

Samsvarandi omanfyri standandi setir minnilutin (Adolf V. Hansen) fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

1. Í pkt. 2 í §1 verður §4, 2. pkt. orðað soleiðis. »Miðstiforvinningurin er pr. 1 apríl 1983 kr. 681,70 til hvørn mannin fyri hvønn dróðrardagin.«

1. I pkt. 2 i §1 formuleres §4, 2. pkt. således: »Mindsteindtægten er pr. 1. april 1983 kr. 681,70 til hver af mandskaberne for hver fiskedag.«

2. Í §5, 1. stk., pkt. a verður í staðin fyri »25 oyru/kg.« sett: »50 oyru/kg.«

2. I §5, stk. 1 a indsættes i stedet for »25 øre/kg.«: »50 øre/kg.«

3. **Uppskot**
**til**

**broyting í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um stuðul til fiskivinnuna við seinni broytingum.**

Í §5, 1. stk. b verður sett »100 oyru/kg« í staðin fyri »50 oyru/kg.«

**ændring i lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om støtte til fiskerierhvervet med senere ændringer**

I §5, stk. 1 b ændres »50 øre/kg« til: »100 øre/kg.«

**II.**

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

4. Í §6, 1. stk. verða í pkt. c orðini »til saltfiska-, frysti- ella fiðnaðarfiskaveiðu« broytt til: »frysti- og saltfiskveiðu«.

4. I §6 ændres i pkt. c ordene »saltfiske-, fryse- eller fersk-fiskefangst« til: »Fryse- og saltfiskefangst«.

5. **Broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| Í §7 a og b útganga orðini: »fyri fiskasløgini blálongu, kongafisk, svartkalva og langaspori« | I §7 a og b udgår ordene: »for fiskesorterne blålange, rødfisk, hellefisk og skolæst« |

6. **Broytingaruppskot**
*ad III*
*uppskot til brennioljustudning til fiskiskip*

| | |
|---|---|
| Í §2, 2. stk. verður orðingin: »Fer brennioljuprísurin í Føroyum niður um 230 oyru/liturin, lækkar studningurin við 1 oyra fyri hvørji 2 oyru, prísurin á brennilolju er niðan fyri 230 oyru/liturin.« | I §2, 2. stk. bliver formuleringen: »Falder prisen for brændselsolie på Færøerne til under 230 øre/literen, formindskes tilskuddet med 1 øre for hver 2 øre, prisen for brændselsolie er neden for 230 øre/literen.« |

2. viðgerð 18. mai 1983:

Broyting frá meiriluta í fíggjarnevndini til §1 samtykt við 23-0, §5 samtykt við 31-0, §1, pkt. 16 samtykt við 27-0 (øll nevndin uttan Adolf Hansen) samtykt við 17-0.

Meirilutauppskotið frá nevndini til ráfiskagrunn §1 samtykt við 17-0, §2 uttan atkvøðugreiðslu. Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 17-0. Uppskot um at beina málið aftur í nevnd fall við 17-0 ímóti. Landsstýrisuppskotið soleiðis broytt

I §1 samtykt við 22-0, §2 samtykt við 19-0, soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 25-0.

II §1 samtykt við 19-0, §2 samtykt við 18-0, soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 19-0.

III §1 samtykt við 21-0, §§2-4 samtyktar við 25-0, soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 29-0.

Broytingaruppskot frá minniluta O. Mikkelsen fall við 5-0, Broytingasruppskot frá minniluta Atla Dam pkt. 1 fall við 14-0, pkt. 2 fall við 13-0, pkt. 4 fall við 14 ja-atkvøðum, 18 atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverri Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskason, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein, Petur Reinert.

Pkt. 15 fall við 15-0, pkt. 21 fall við 6-0. Uppskot frá minniluta (Atli Dam) §1 fall við 13-0, og frá minniluta (A. Hansen), pkt. 1 fall við 13-0, II fall við 2-0, pkt. 5 fall við 2-0, pkt. 6 fall við 12-0. Uppskot frá minniluta (Atli Dam) samtykt við 18-0, frá minniluta (Ove Mikkelsen) fall við 14-0 og frá minniluta (Adolf V. Hansen) fall við 2-0.

3. mai løgdu tingmenninir Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Hilmar Kass og Olaf Olsen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Løgtingslóg um eykastudning til veiðu av ídnaðarfiski.

Aftan á orðini: »12 oyru/kg« verður sett: »og tá fiskurin verður landaður uttanlands 6 oyru/kg«.

Loyvi til frávik í tíðarfreistini at viðgera málið varð givið. 3. viðgerð sama dag á seinri fundi. Uppskot I samtykt við 30-0 atkvøðum, II broyting til §1 samtykt við 23-0, II soleiðis broytt samtykt við 27-0. III samtykt við 29-0. Uppskot um ráfiskagrunn samtykt við 18-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1517-2-1. Lógirnar nr. 56, 57, 58, 59 frá 6. juni 1983 og nr. 73 frá 18. juli 1983.

# 119. Løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið

Á 19. fundi, fríggjadagin 29. mai, legði Lilit Sammelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.**

§ 1. Landsstýrinum verður sambært § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979 heimilað at skipa fyri grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.

§ 2. Hóskandi undirvísing, sum vanliga tekur eitt ár, fyrireikar næmingin grundliggjandi innlit í og kunnleika til fyrisitingar-, handils- og skrivstovuvirki. Í sambandi við undirvísingina kann verða skipað soleiðis fyri, at næmingar í ávísum tíðum kunnu fara út á arbeiðsplássi.

**Lagtingslov om grunduddannelse indenfor administrations-, handels- og kontorområdet.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til i medfør af § 2 i rammelov nr. 54 fra 14. februar 1979 at etablere grunduddannelse indenfor administrations-, handels- og kontorområdet.

§ 2. Undervisningen, der giver den basisuddannelse på handelsskole, der sædvanligvis tager et år. Formålet med denne undervisning er at give eleverne grundlæggende indblik i og kendskab til administrations-, handels- og kontorarbejdet. I forbindelse med basisåret kan undervisningen være delt således, at eleverne i visse tidsrum kommer ud på arbejdspladserne.

*2. stk.* Umframt ta fakligu undirvísingina verður undirvíst í almennum lærugreinum og evnum, sum m.a. miða ímóti at geva næmingunum kunnleika til arbeiðsviðurskifti og til samfelagið sum heild.

*3. stk.* Tá stoðisarið er lokið, fer víðari útbúgving, ið tekur 2 ár, skiftivís fram á skúlum og á upplæringarplássum, har høvuðsdenturin verður lagdur á ta praktisku upplæringina. Landsskúlaráðið kann í einstøkum førum geva loyvi til, at 2. partur í høvuðsheitum ella bert fer fram á skúla.

*4. stk.* Útbúgvingin eigur at verða uppbygd á ein slíkan hátt, at næmingur á hóskandi stigi kann gevast við útbúgvingini við rætti at fara til annan lesnað ella í vinnu, og soleiðis at hann seinni kann halda fram við upprunaligu útbúgving sína.

*5. stk.* Brekaðir næmingar kunnu fáa serundirvísing ella annan sernámsfrøðiligan stuðul eftir nærri av landsskúlaráðnum ásettum reglum.

*6. stk.* Eisini eiga næmingarnir at kunna fáa leiðbeiðing um val av útbúgving og yrki og um persónlig viðurskifti.

**§ 3.** Landsstýrið ásetir nærri reglur um upptøku av næmingum, undirvísing og prógvtoku.

*2. stk.* Landsskúlaráðið ásetir nærri reglur um viðurskiftini annars hesi útbúgving viðvíkjandi.

*Stk. 2.* Udover den faglige undervisning undervises der i almindelige fag og emner, som bl.a. har det formål at give eleverne kendskab til arbejdsforhold og til samfundet som helhed.

*Stk. 3.* Når basisåret er gennemgået, foregår den videre uddannelse, som tager 2 år, skiftevis på skoler og i praktikpladser, hvor hovedvægten lægges på den praktiske oplæring. Landsskolerådet kan i enkelte tilfælde give tilladelse til, at 2. del hovedsagelig eller udelukkende foregår på skole.

*Stk. 4.* Uddannelsen skal være opbygget på en sådan måde, at en elev på et passende trin kan ophøre med uddannelsen med ret til at fortsætte i en anden uddannelse eller i et erhverv, og således at den pågældende senere kan fortsætte med sin oprindelige uddannelse.

*5. stk.* Handicappede elever kan få særundervisning eller anden specialstøtte efter nærmere regler, som undervisningsrådet fastsætter.

*Stk. 6.* Elever skal også kunne få vejledning om uddannelse og om personlige forhold.

**§ 3.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om optagelse af elever, undervisning og eksamen.

*Stk. 2.* Undervisningsrådet fastsætter nærmere regler om de øvrige forhold vedrørende

andi.

**§4.** Sáttmálin um upplæringarpláss, sum aftan á støðisárið verður gjørdur millum næming og upplæringarpláss, skal verða skrivligur, og skal lønin til næmingin vera ásett í sáttmálanum.

*2. stk.* Lønin verður ásett eftir sáttmála millum arbeiðsgevara- og arbeiðstakaratfeløgini innan hvørt økið sær. Er eingin sáttmáli, ásetir landsstýrið, hvussu lønin eigur at verða roknað.

*3. stk.* Læruráðið ásetir nærri reglur um, hvussu upplæringaravtalur skulu ljóða. Læruráðið kann skipa fyri skráseting av upplæringarplássum og eftirliti við, at upplæringaravtalur verða hildnar.

**§5.** Góðkenning av upplæringarplássum fer fram, og møguligar ósemjur millum næming og upplæringarpláss verða at avgera eftir reglunum í lærlingalógini.

**§6.** Landsstýrið kann eftir tilmæli frá viðkaða læruráðnum seta forboð fyri at gera lærusáttmálar sambært deild IV í lóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti við seinni broytingum í ávísum tíðarskeiðum í ávísum økjum í landinum.

denne uddannelse.

**§4.** Aftalen om praktikplads, som efter basisåret indgås mellem elev og praktikplads, skal være skriftlig, og elevens løn skal fastsættes i aftalen.

*Stk. 2.* Lønnen fastsættes ifølge overenskomst mellem arbejdsgiver- og arbejdstagerforeningerne for hvert område for sig. Findes der ingen overenskomst, fastsætter landsstyret, hvorledes lønnen skal beregnes.

*Stk. 3.* Lærerådet fastsætter nærmere regler om, hvorledes praktikaftaler skal formuleres. Lærerådet kan etablere registrering af praktikpladser og tilsyn med, at praktikaftaler overholdes.

**§5.** Godkendelse af praktikpladser foretages og mulige uoverensstemmelser mellem elev og praktikplads afgøres efter reglerne i lærlingeloven.

**§6.** Landsstyret kan efter indstilling fra det udvidede læreråd nedlægge forbud mod, at der indgås lærekontrakter i medfør af afsnit IV i lov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold med senere ændringer i bestemte tidsrum i bestemte dele af landet.

§7. Henda lóg kemur í gildi 1. august 1983 og hevur fyribils gildi til 1. august 1986.

§7. Denne lov træder i kraft 1. august 1983 og er foreløbig gældende til 1. august 1986.

**Viðmerkiugar:**

Í lóg nr. 54 frá 14. februar 1979, sum var sett í gildi 11. september 1979, er heimilað føroysku myndugleikunum at gera nærri reglur um innihald, vav og skipan av tí undirvísing, sum skal fara fram á góðkendum handilsskúlum. Hóast tað eru meira enn 3 ár liðin, síðani henda lóg kom í gildi, eru higartil ongar reglur gjørdar fyri hetta undirvísingarøki, men er undirvísingin á Føroya Handilsskúla farin fram eftir somu skipan sum frammanundan. Tað hava leingi verið røddir frammi um at leggja handilsskúlan um frá kvøldskúla til dagskúla, og setti landsskúlastjórin í februar 1981 eina nevnd til at gera uppskot um umlegging av handilsskúlaundirvísingini. Nevndin legði fram álit 25. november 1982, og varð skotið upp at fara undir eina nýggja útbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið. Um hvussu útbúgvingin er ætlað uppbygd, verður víst til omanfyri nevnda álit, skjal 1, og til uppritið frá landsskúlafyrisitingini til landsskúlaráðið um hetta mál, skjal 2.

Áðrenn farið kann verða undir hesa útbúgving, er tað sambært §2 í rammulógini neyðugt við eini løgtingslóg fyri hesa útbúgving, og er tí hetta løgtingslógaruppskot sett fram.

Løgtingslógaruppskotið gevur fyri tað fyrsta landsstýrinum heimild at skipa fyri, at henda útbúgvingin kann byrja. Harumframt ásetir tað í høvuðsheitum, hvussu útbúgvingin verður uppbygd.

Í §2, 1. stk., 1. pkt., verður sagt, at støðisárið vanliga tekur 1 ár. Endamálið við at siga »vanliga« er at skapa møguleikar fyri, at skúlin kann bjóða næmingum við serligum forkunnleika eina støðisútbúgving, sum tekur minni enn 1 ár, men sum gevur somu rættindi, sí álitið síðu 4. Hetta fer eisini at skapa størri møguleikar fyri, at støðisútbúgvingin eisini kann fara fram í deildum handilsskúlans kring landið, sí álitið síðu 27.

Eftir §6 í uppskotinum verður heimilað landsstýrinum eftir tilmæli frá læruráðnum at seta forboð fyri, at lærusáttmálar eftir lærlingalógini verða gjørdir í ávísum tíðarskeiðum í ávísum økjum. Grundin fyri hesi áseting er at forða fyri, at tað í einum øki í landinum er møguleiki fyri bæði at hava ta traditionellu lærlingaútbúgvingina og FHS-útbúgvingina lið um lið, og er endamálið, at tann nýggja útbúgvingin við tíðini kann avloysa lærlingaútbúgvingina, sí álitið

síðu 16.

Hvat viðvíkur sjálvum innihaldinum í undirvísingini, upptøkutreytunum og prógvtøku umfrant onnur viðurskifti hjá næmingum og lærarum, verða nærri reglur um hetta ásettar av landsstýri og landsskúlaráði í ávikavist kunngerðum og tundskrivum.

Uppskotið nevnir einki um, hvussu henda útbúgving skal fíggjast, og verður her hugsað um útreiðslurnar, sum standast av sjálvari skúlagongdini. Grundin fyri hesum er tann, at sambært anordning nr. 392 frá 3. november 1965 við broyting í anordning nr. 518 frá 20. september 1977, sum eftir §3, 2. stk., í rammulógini framvegis er í gildi, er tað danski ríkiskassin, sum ber allar útreiðslur av undirvísing á handilsskúlanum, sum ikki er vanlig lærlingaundirvísing.

Lærlingaundirvísingin verður goldin við 80% úr ríkiskassanum og 20% av heimstaðarkommununi.

Í §7 verður sagt, at lógin fyribils hevur gildi í 3 ár. Orsøkin til, at lógin er gjørd tíðaravmarkað, er tann, at henda undirvísing í fyrstu syftu er ætlað sum ein roynd, og verður í hesum viðfangi víst til uppritið til Landsskúlaráðið síðu 6.

*Sí skjal 19*

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram á ting av landsstýrinum tann 25. mars 1983 og varð við 1. viðgerð 12. apríl 1983 beint í skúlanevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur skúlanevndin havt fundir við Heðin Samuelsen, handilsskúlastjóra, Jógvan Sundstein, formann í nevndini fyri skúlan, Ludvík Peterseu, landsskúlastjóra, og Eilif Samuelsen, landsstýrismann.

Av skjølunum til landsstýrismálið »Upprit til landsskúlaráðið«, sí skjal 2, bls. 3, sæst, at Føroya Keypmannafelag í sínum skrivi dagfest 13. januar 1983 til nevndina viðvíkjandi framtíðar handilsundirvísing hevur sagt frá, at »nevndin í felag okkara hevur viðgjørt tilfarið á fundi í dag, og var semja um at taka undir við uppskotinum, sum er sera áhugavert, men hvat viðvíkur 2. parti av útbúgvingini, halda vit okkum einans til at rinda praktikantunum løn fyri ta tíð, teir eru í arbeiði á staðnum.«

Í hesum sambandi skal skúlanevndin vísa á, at sambært §4, 1. stk. í løgtingslógaruppskotinum skal sáttmálin um upplæringarpláss, sum aftan á støðisárið verður gjørdur millum næming og upplæringarpláss, verða skrivligur, og skal lønin til næmingin verða ásett í sáttmálanum.

§4, 2. stk. ásetir víðari, at lønin verður ásett eftir sáttmála millum arbeiðsgevara- og arbeiðstakarafeløgini innan hvørt øki sær. Er eingin sáttmáli, ásetir landsstýrið, hvussu lønin eigur at verða roknað.

Lønarspurningurin verður sostatt loystur í sáttmála millum arbeiðsgevara- og arbeiðstakarafeløgini, ella, har eingin sáttmáli er, við at landsstýrið ásetir, hvussu lønin eigur at verða roknað.

Skúlanevndin kann leggja aftrat, at skipanin viðvíkjandi lønini til tekniskar lærlingar, meðan teir ganga á tekniskan skúla, sambært løgtingslóg nr. 88 frá 18. september 1980 um broyting í lærlingalógini er tann, at landskassin endurrindar lærumeistarunum 50% av lógásettu lærlingalønini, meðan lærlingarnir ganga á tekniskum skúla.

Tá spurningurin um løn til næmingin sambært frammanfyri umrøddu §4 í uppskoti til løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið verður aktuellur, tað er í fyrsta lagi í skúlaárinum 1984/85, nevniliga í 2. parti av FHS-grundútbúgvingini, fer ætlandi at verða umhugsað, um sama endurgjaldsskipan tá skal verða galdandi fyri FHS-næmingar sum fyri tekniskar lærlingar sambært løgtingslóg nr. 88/1980.

Skúlanevndin hevur kannað, hvussu umrødda grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið hóskar til tær ætlanir, sum ein nevnd hjá landsskúlafyrisitingini í løtuni arbeiðir við um útbúgvingina hjá teimum 16-19 ára gomlu, og skúlanevndin er komin til tað úrslit, at umrødda grundútbúgving hóskar væl til hesar ætlanir, og at henda útbúgving, tá hon umframt í Tórshavn fer at verða stovnað á øðrum plássum í landinum, saman við øðrum útbúgvingarmøguleikum, t.d. útbúgving innan fiskivinnuna, fer at verða eitt gott tilboð til tey ungu har og sostatt eitt stórt framstig í mun til støðuna í dag, har tey ungu á summum plássum bert hava HF-undirvísingina at fara til aftan á lokna skúlagongd í fólkaskúlanum.

Skúlanevndin hevur eisini umhugsað, um tað fara at verða nóg nógv upplæringarpláss til teir næmingar innan umrøddu grundútbúgving, sum aftan á støðisárið fara at halda fram við víðari útbúgving skiftivís á skúla og upplæringarplássi.

Handilsskúlin hevur upplýst, at undir verandi skipan hava umleið 40% av næmingunum lærusáttmála, tá teir byrja undirvísingina á handilsskúlanum, og nakað út á heystið er talið á næmingum, sum hava fingið sær lærusáttmála hækkað til 60%. Tá handilsskúlaútbúgvingin er liðug aftan á 2 ár, er talið á næmingum við lærusáttmála eftir meting handilsskúlans, tá eingin greið tøl eru um hetta, vaksið til 80%.

Longu sum er fylgir ein partur av næmingum handilsskúlans sostatt undirvísingini uttan at hava lærusáttmála, og roknað verður við, at ein partur av teimum næmingum, sum fer undir støðisárið innan umrøddu grundútbúgving, fer at gera hetta uttan at hava eina fasta ætlan um at halda fram við hesi útbúgving og gera sáttmála við upplæringarpláss. Hesir næmingar hava møguleika at fara víðari til hægri handilsskúlaundirvísing uttan at hava praktiska upplæring, eins og teir kunnu gerast tekniskir lærlingar ella fáa sær aðra víðari útbúgving. Í hesum sambandi vísir skúlanevndin til tað »uppskot um nýggjan handilsskúlastruktur«, sum er skjal til tað grøna álitið, sí skjal 1 til løgtingsmálið.

Viðvíkjandi næmingatali handilsskúlans innan verandi skrivstovu-, heilsølu- og smásølunæmingaútbúgving vísir skúlanevndin til sama grøna álit, skjalið »Næmingatøl v.m.«, sum m.a. vísir, at samlaða talið av hesum næmingum 1. januar 1981 var 80 fyrsta árið og 89 annað árið, av hesum í Tórshavn ávikavist 68 fyrsta árið og 62 annað árið.

Aftan á viðgerðina av málinum hevur skúlanevndin býtt seg í tveir meirilutar og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Óli Breckmann, Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen og Jóannes Dalsgaard) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nøkrum málsligum broytingum og setir um hesar fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

I §2, stk. 1 ændres »almindelige« til: »almene«.

Í §2, 4. stk. verður »næmingar« broytt til: »næmingur«.

§2, stk. 6 formuleres således: »Elever skal også kunne få vejledning om valg af uddannelse og erhverv og om personlige forhold.«

Ein annar meiriluti (Óli Breckmann, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at tann nevndin, sum arbeiðir við spurninginum um útbúgving hjá teimum 16-19 ára gomlu, kemur við áliti í seinasta lagi 1. februar 1982.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard) tekur støðu til hetta uppskot meirilutans í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Finnbogi Isaksen) hevur ta støðu, at verandi vanlig og hægri handilsskúlaútbúgving eigur at koma í fasta legu, áðrenn nøkur nýggj útbúgving verður sett á stovn, og setir sostatt einki uppskot fram.

2. viðgerð 17. mai, atkvøðugreiðsla 18. mai. Uppskot til samtyktar frá meirilutanum í skúlanevndini samtykt við 23-0 atkvøðum. § 1 samtykt við 28-0, broytingaruppskot til §2 frá Óla Breckmann, Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen og Jóannes Dalsgaard samtykt við 28-0, §2 soleiðis broytt samtykt við 26-0, §§3-7 samtyktar við 26-0.

3. viðgerð 18. mai. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2128-5-8. Lóg nr. 69 frá 30. juni 1983.

# 120. Bústaðarhús til fólk í útbúgving

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um bústaðarhús til fólk í útbúgving.**

**§1.** Eftir reglunum í hesi lóg verður studningur latin til bústaðarhús, sum hava til endamál at hýsa fólki í útbúgving, og tryggja teimum gott og hóskandi tilhald í útbúgvingartíðini.

**§2.** Studningur verður latin til:
1) Bygging av nýggjum bústaðarhúsum.
2) Keyp og umbygging av verandi bygningum til bústaðarhús.
3) Rakstur av bústaðarhúsum.

**§3.** Studningur kann veitast við upp til 55% av byggikostnaðinum ella keypsprísi og umbyggingarkostnaði.

**lagtingslov om kollegier til folk under uddannelse.**

**§1.** Efter bestemmelserne i denne lov ydes tilskud til kollegier, der har til formål at give folk under uddannelse husly og sikre dem godt og passende ophold i uddannelsestiden.

**§2.** Tilskud ydes til:
1) Bygning af nye kollegier.
2) Køb og ombygning af værende bygninger til kollegier.
3) Drift af kollegier.

**§3.** Tilskud kan ydes med op til 55% af byggeomkostningerne eller købspris og ombygningsudgifter.

*2. stk.* Studningurin er treytaður av, at viðkomandi stovnur hevur eginpening, sum, tá talan er um nýbygging, svarar til virðið av byggibúnum grundøki og annars til 10% av keypspríси og umbyggingarkostnað.

**§4.** Studningurin verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán við pantirætti í ognini innan fyri 90% av virðinum.

*2. stk.* Verður bústaðarhúsið ikki longur nýtt til upprunaliga endamálið, fellur lánið til gjaldingar.

**§5.** Umsøkjarar, ið eru farnir undir bygging, keyp ella umbygging av bústaðarhúsi uttan frammanundan at vissa sær góðkenning landsstýrisins, kunnu ikki rokna við studningi úr landskassanum.

**§6.** Í rakstrarstudningi kann veitast upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum.

**§7.** Bústaðarhús, sum studningur verður latin til, skal vera sjálveigandi stovnur og skal hava viðtøkur, sum eru góðtiknar av landsstýrinum.

*2. stk.* Verða íbúðarhús ikki longur nýtt til endamálið ella seld, fellur ognin/nettosøluprísurin til landskassan, og ger

*Stk. 2.* Tilskudet er betinget af, at den pågældende institution har en egenkapital, som, når det drejer sig om nybyggeri, svarer til værdien af et byggemodent grundstykke og ellers til 10% af købspris og ombygningsudgifter.

**§4.** Tilskudet ydes som rente- og afdragsfrit lån med pant i ejendommen indenfor 90% af værdien.

*Stk. 2.* Benyttes kollegiet ikke længere til det oprindelige formål, forfalder lånet til betaling.

**§5.** Ansøgere, der har påbegyndt byggeri, køb eller ombygning af kollegium uden forud at have sikret sig landsstyrets godkendelse, kan ikke regne med at få tilskud fra landskassen.

**§6.** I driftstilskud kan ydes op til 50% af udgifterne til renter og afdrag af de oprindelige prioritetslån.

**§7.** Kollegium, som der ydes tilskud til, skal være en selvejende institution og skal have vedtægter godkendt af landsstyret.

*Stk. 2.* Benyttes et kollegium ikke længere til formålet eller bliver solgt, falder ejendommen/nettosalgssummen til

landsstýrið av, hvussu ognin/peningurin skal nýtast.

landskassen, og afgør landsstyret, hvorledes ejendommen/beløbet skal anvendes.

**§8.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 34 frá 27. mai 1968 um lærlingaheim.

**§8.** Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 34 af 27. mai 1968 om lærlingehjem.

**Viðmerkingar:**

Í Føroyum hava vit onga vanliga lóg um bygging av íbúðarhúsum (kollegium) til fólk undir útbúgving.

Løgtingslóg nr. 34 frá 27. mai 1968 um lærlingaheim er bert ætlað til stuðul til bygging og rakstur av íbúðarhúsum til handverkslærlingar. Sjálvt um henda lóg nú er úti við 15 ára gomul, og peningur hevur verið tøkur til bygging, er eingin nýtsla enn gjørd av lógini. Orsøkin man helst vera tann, at fíggingarmynstrið eftir lógini ikki er nýtiligt. Annars kann sigast, at tíðin er farin frá tankanum um at byggja íbúðarhús, sum bert eru ætlað til fólk undir einari ávísari útbúgving.

Til ávísar lærustovnar eru knýtt skúlaheim, t.d. Studentaskúlan, Tekniskúlarnar, Sjúkrasystraskúlan og Læraraskúlan, men nøkta hesi heim bert tørvin hjá einum lítlum parti av fólki undir útbúgbing.

Landsfelag Føroyinga í Utbúgving hevur arbeitt við spurninginum um at útvega bústaðarhús til fólk undir útbúgving, og verður hugsað um bygging av minni heimum til eini 6 fólk. Kostnaðurin fyri eitt tílíkt heim til 6 fólk verður mettur til at vera 685.000,00 kr. umframt grundøki. Verður bygt við tí fígging, sum víst er í hjálagda skjali, verður húsaleigan umleið 645 kr. um mánaðin.

Ein fyrimunur við bygging av tílíkum smærri húsum er, at tey kunnu rekast bíligari, við tað at tað ikki skuldi verið neyðugt at sett fólk í føst størv, tá skyldan at ansa eftir húsinum og halda tað reint verður løgd á íbúðarfólkini.

Landsstýrið hugsar sær bústaðarhúsini fíggjað við vanligum lánum úr sparikassa og húsalánsgrunni og harafturat við einum rentu- og avdráttarfríum láni úr landskassanum upp á 55% av byggikostnaðinum. Herafturat kemur grundøkið, sum væntandi fæst ókeypis frá tí kommunu, har bústaðarhúsið verður bygt.

Landskassastudningurin til raksturin verður helvtin av útreiðslunum til rentur og avdráttir. So hvørt sum stovnsins partur av útreiðslunum til rentur og avdráttir minkar, kemur stovnurin at ráða

yvir meira peningi til viðlíkahald av ognini.

Eftir fyriliggjandi uppskoti til fígging og rakstur av bústaðarhúsum skuldi kostnaðurin fyri hvørt búfólk komið at ligið um 645 kr. um mánaðin, um so er, at tann kostnaðarætlan, ið felagið fyri fólk undir útbúgving hevur gjørt.

Viðlagt fylgir meting yvir kostnað, fígging og rakstur av einum bústaðarhúsi fyri 6 fólk.

**Kostnaður**

| | |
|---|---|
| Grundøki (ókeypis frá kommununi) | 70.000 kr. |
| Byggikostnaður | 685.000 — |
| Saml. kostnaður | 755.000 kr. |

**Fíggiug**

| | |
|---|---|
| Landskassastudningur (55%) | 375.000 kr. |
| Sparikassalán | 180.000 — |
| Húsalánsgrunnurin | 130.000 — |
| Grundøki ella eginpeningur | 70.000 — |
| Tils. | 755.000 kr. |

**Rakstur**

| | | |
|---|---|---|
| Olja | 11.000 kr. | |
| El | 6.000 — | |
| Trygging | 2.000 — | |
| Viðlíkahald | 5.000 — | 24.000 kr. |
| Avdráttir | 14.000 kr. | |
| Rentur | 31.000 — | |
| | 45.000 kr. | |
| Studningur 50% | 22.500 — | 22.500 — |
| Rakstrarútreiðslur árl. | | 46.500 kr. |
| — — um mánaðin | | 3.875 kr. |
| Útreiðslur pr. fólk (6) um mánaðin | | 645 kr. |

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1983 og undir 1. viðgerð tann 12. apríl 1983 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 13. mai 1983 viðgjørt málið.

Semja var í nevndini um, at §4, 2. stk., ið er soljóðandi:

»Verður bústaðarhúsið ikki longur nýtt til upprunaliga endamálið, fellur lánið til gjaldingar.«

er óneyðugt, tá tað í aðrari reglu í lógini er fingin heimild fyri somu loysn.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Svend Age Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við omanfyri nevndu broyting og setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Í §4 verður stk. 2 strikað. I §4 fjernes stk. 2 i lovteksten.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 17. mai, atkvøðugreiðslan 18. mai. §1 samtykt við 29-0, §§2-3 samtyktar við 28-0, broytingaruppskot til §4 frá meirilutanum í fíggjarnevndini samtykt við 27-0, §4 soleiðis broytt samtykt við 25-0, §§5-7 samtyktar við 27-0, §8 samtykt við 28-0.

3. viðgerð á seinri fundi sama dag. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2115-6-2 Lóg nr. 63 frá 23. juni 1963

# 121. Partapeningur í P/f Elektron

Ár 1983, fríggjadagin 25. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um partapening í p/f Elektron.**

**§1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til kr. 400.000 í partapeningi í p/f Elektron, Tórshavn, og at leggja peningin út úr landskassanum.

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**Lagtingslov om aktiekapital i p/f Elektron.**

**§1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at indskyde indtil kr. 400.000 i p/f Elektron, Tórshavn, og at betale beløbet af landskassens midler.

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Eftir ætlan verða bæði álíkningin og innkrevjingin av samtíðarskattinum at leggja undir elektroniska dataviðgerð. Landsstýrið hevur í hesum sambandi samráðst við p/f Elektron um at átaka sær tær rættiliga umfatandi datateknisku uppgávurnar. Felagið er sinnað at taka uppgávurnar upp á seg. Samráðingar eru í løtuni um uppskot til sáttmála millum landsstýrið og felagið.

Av tí at Elektron verður so týðandi og avgerandi partur í tí ætlaðu nýggju skattaskipanini, er tað ein spurningur, um ikki landsstýrið

eigur at gerast eigari av parti av partapeninginum í felagnum og á henda hátt tryggja sær innlit í felagið og ávirkan á rakstur og leiðslu við at tryggja sær limaskap í stýrinum.

Tilsøgn liggur nú fyri frá felagnum um, at landsstýrið við at tekna 400.000 kr. av tí samlaða partapeninginum upp á 3.800.000 kr. tryggjar sær ein lim í stýrinum, í tí eru 3-5 limir. Eisini verður endamálsgreinin broytt soleiðis, at felagið umframt høvuðsendamálið at virka í edv fyri føroysku peningastovnarnar eisini hevur tað høvuðsendamál at virka fyri landsstýrið og stovnar tess.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í edv-nevndina, sum 13. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 25. mars 1983 og við 1. viðgerð beint í serligu edv-tingnevndina.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild til at tekna 400.000 kr. í partapeningi í p/f Elektron. Orsøkin til, at landsstýrið ynskir at eiga partapening í felagnum, er, at p/f Elektron skal taka sær av elektronisku dataviðgerðini av kelduskattaskipanini. Við at eiga partapening í felagnum fær landsstýrið ein nevndarlim og harvið innlit og ávirkan á rakstur felagsins.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í tríggjar minnilutar.

Størsti bólkurin (Olaf Olsen, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) vísir til tað, sum andstøðan hevur ført fram í málinum um EDV-skráir um samtíðarskattaskipanina, og kann út frá hesum ikki taka undir við, at ein týðandi partur av skattaumsitingini verður latin eini privatfyritøku.

Tað er eyðsæð, at endamálið við uppskoti landsstýrisins um partapening í P/F Elektron bert hevur til endamáls at sissa ein almenning, ið gerst alt meira ótryggur við ta EDV-loysn, sum samgongan hevur valt í samtíðarskattamálinum.

Minnilutin skal enn eina ferð minna á, at EDV-loysn samgongunnar í samtíðarskattamálinum er skaðilig av mongum grundum. Tann mest álvarsama grundin er hon, at privatu peningastovnarnir og teir, sum eiga valdið í hesum stovnum, og sum frammanundan hava ov stórt

vald á tí einstaka, fara at fáa uppaftur meira vald.

Hetta stendst av, at EDV-loysn samgongunnar fer at geva privatum peningastovnum kunnleika til privat viðurskifti borgaranna, sum annars eru hesum peningastovnum fullkomiliga óviðkomandi.

Sum uppskotið um partapening í Elektron er orðað, fær tað almenna hvørki ávirkan ella innlit á rakstur felagsins, við tað at almenni partapeningurin bert gevur rætt til ein nevndarlim í P/F Elektron.

Minnilutin kann tí ikki taka undir við lógaruppskotinum, soleiðis sum tað er orðað, og setur í staðin fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Føroya Løgting samtykkir, at verður týðandi partur av samtíðarskattaskipanini latin privatum EDV-virki upp í hendi at umsita, má hitt almenna beinan vegin ogna sær 51% av partapeninginum í viðkomandi virki.
2. Føroya Landsstýri verður álagt at føra tær neyðugu samráðingarnar við viðkomandi virki og leggja úrslitið av samráðingunum við uppskoti til rakstrar- og yvirtøkusáttmála fyri tingið í seinasta lagi sama dag, sum uppskotið til samtíðarskattaskipan kemur til 3. viðgerð á tingi.

Minnilutin (Adolf Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum um at seta partapening í P/f Elektron við teirri grundgeving, at landið frammanundan er eigari av einum edv-tóli, sum við einari umlegging, ið kostar minni enn 1 mió. kr., kann átaka sær allar skattligar edv-viðgerðir og nøkta tørvin mong ár fram í tíðina.

2. viðgerð 1. juni. Uppskot landsstýrisins §1 samtykt við 17 atkvøðum fyri og 10 ímóti, §2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð samtykt við 17-0. Uppskot til samtyktar frá minniluta í nevndini fall við 13-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Loyvi at frávíkja tíðarfreistini varð givið. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 301-13-2. Lóg nr. 65 frá 23. juni 1983

# 122. Veiting av heimarætti

Ár 1983, fríggjadagin 8. apríl legði lóganevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur 21. mars 1982 skrivað tinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 5 frá 17. november 1982 um veiting av heimarætti verður lýst at galda í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.«

Málið varð beint í lóganevndina, sum hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Øssur Dam Jacobsen, Jákup Lindenskov og Agnar Nielsen) setir fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóg nr. 5 frá 17. november 1982 um veiting av heimarætti verður lýst at galda í Føroyum.

Minnilutin (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

# 123. Broyting í lóg um partapening og veðhald til millumlanda ferðamannaskip

Ár 1983, mánadagin 11. aprfl legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tekning av partapeningi í og veitan av veðhaldi til felag við endamáli at keypa og umbyggja ferðamannaskip til millumlandasigling.**

**§1.** Í løgtingslóg nr. 22 frá 4. mars 1983 um tekning av partapeningi í og veitan av veðhaldi til felag við endamáli at keypa og umbyggja ferðamannaskip til millumlanda sigling verður í § 1 skoytt uppí sum nýtt stk. 4:

»Eisini verður landsstýrið saman við fíggjarnevndini heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri prioritetsláni til nevnda skip upp á 4% av íleggingini eftir meting, og skal hetta lán hava pantirætt í skipinum næst aftan á prioritetslán upp á 42%«

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om tegning af aktiekapital i samt ydelse af garanti til selskab med det formål at købe og ombygge passagerskip til udenrigsfart.**

**§1.** I lagtingslov nr. 22 af 4. marts 1983 om tegning af aktiekapital i samt ydelse af garanti til selskab med det formål at købe og ombygge passagerskib til udenrigsfart tilføjes i § 1 som nyt stk. 4:

»Ligeledes bemyndiges landsstyret til sammen med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for prioritetslån til nævnte skib op til 4% af investeringen efter vurdering, og skal dette lån sikres med pant i skibet næst efter prioritetslån på indtil 42%.«

§2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
P/f Smyril-Line hevur søkt Føroya landskassa um landskassaveðhald, stórt 4% av samlaða keypspeninginum og umbyggikostnaðinum í sambandi við keyp av ferðamannaskipinum m/s »Gustav Vasa«.

Sum kunnugt er frammanundan veitt felagnum 15% í veðhaldi. Tað er soleiðis, at fyri at fáa fíggingina endaliga í lagi, er avgerandi neyðugt við einum landskassaveðhaldi upp á 4% aftrat.

P/f Smyril-Line sær sær ongan annan møguleika fyri fígging, enn at eitt landskassaveðhald verður veitt.

Tað hevur bráðskund at útvega nevnda landskassaveðhald, tí avtalaði leveringsdagurin er settur til 23. apríl 1983.

Veðrættarstøðan í skipinum kemur at verða henda:

42% Nederlandse Scheepshypotheekbank
4% Schiffshypotheekenbank Zu Lübeck, Kiel (við landskassaveðh.)
14% Schiffshypotheekenbank zu Lübeck, Kiel (við øðrum kautionistum)
15% Seljarakredittur
15% Københavns Handelsbank (við landskassaveðhaldi).

1. viðgerð 12. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 11. apríl 1983 og undir 1. viðgerð tann 12. apríl beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 13. apríl viðgjørt málið.

Undir 1. viðgerð kom fram, at prísurin fyri »Gustav Vasa« møguliga var 30 mió. kr. ov høgur. Hetta vóru upplýsingar frá einum lesarabræv 12. apríl 1983 í »Dimmalætting«.

Fíggjarnevndin hevur kannað málið, og fylgir frágreiðing hesum viðvíkjandi við sum skjal.

Ein samd fíggjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

## Frágreiðing

Í sambandi við lesarabræv í Dimmalætting 12/4-1983 um »Gustav Vasa« gav fíggjarnevndarformaðurin Ivan Johannesen mær ta uppgávu, at eg allarskjótast og innan einaferð seinnapartin ídag skuldi royna at skaffa honum fylgjandi upplýsingar:

Hvussu ljóðaði greinin í »Dagens Nyheter«, sum sipað varð til, og hvønn dag var hon í bløðunum, og hvør hevði skrivað hana. Hann skuldi nýta hesar upplýsingar á fundi seinnapartin.

Uppgávan varð ikki einføld at loysa, men aftaná at hava hugsað eina løtu ringdi eg til Viðskiftastovuna í Keypmannahavn og setti teir inn í problemið og bað teir hjálpa okkum við upplýsingum, um tað var gjørligt. Teir lovaðu at gera sítt besta og skuldu ringja aftur skjótast.

Aftan á drúgva løtu ringdu teir aftur, teir høvdu vent sær til lesistovuna í Fólkatinginum, og eitt hjálparfólk har hevði blaðað bløðini »Dagens Nyheter« ígjøgnum fyri mánadagin 11/4, sunnudagin 10/4 og leygardagin 9/4, men kundi einki finna um »Gustav Vasa«, og hildu ikki meir kundi gerast, uttan so at tey fingu nærri at vita, nær greinin hevði verið í blaðnum.

Aftan á hesi boð ringdi Viðskiftastovan til blaðstjórnina fyri »Dagens Nyheter« í Stockholm og spurdi, um teir mintust, at grein um Gustav Vasa hevði verið í blaðnum, tað kundu teir tíverri ikki minnast, men um teir fingu nærri upplýst, dag ella stutt tíðarskeið, vildu teir fegnir leita greinina fram og senda hana á telex við teim upplýsingum, vit ynsktu.

Aftaná at hava hesi boðini ringdi eg til blaðstjóran á Dimmalætting og greiddi honum frá støðuni. Hann segði, at hann skuldi seta seg í samband við lesarabrævskrivaran og biðja um upplýsingar, sum hann sipaði til.

Løtu seinni ringdi blaðstjórin, hann hevði tosað við lesarabrævskrivaran, sum upplýsti, at greinin ikki neyðturviliga hevði verið í Dagens Nyheter mánadagin, men tá hevði heimildarmaður hansara ringt seg upp frá Svøríki og sagt sær frá hesum, nú var maðurin, sum sigldi úti, farin út aftur at sigla, og hann kundi einki siga um, nær hann møguliga kundi fáa fatur á honum og seta honum hesar ávísu spurningar greinini í Dagens Nyheter viðvíkjandi.

Eg rokni ikki við, at vit fyribils kunnu skaffa nærri upplýsingar nevnda lesarbrævi viðvíkjandi.

*Fiskivinnustovan 13/4-83*
G. Gunnarsson

*Dimmalætting 12/4-83*

## Gustav Vasa

Her fari eg at seta ein beinleiðis spurning til landsstýrið og Føroya løgting.

Snimma mánamorgunin frættust tey tíðindi, at svenska dagblaðið »Dagens Nyheter« skrivar, at føroyingar eru tiknir við nøsini, tá teir hava keypt »Gustav Vasa« 30 milliónir svenskar krónur ov dýran.

Er hetta satt, so er hetta skipakeyp ein spurningur, tit hava skyldu til at koma til botns í, nú skattalógin er til viðgerðar.

Eftir lýsing í Dimmalætting nr. 26 eru bert 4 milliónir kr. av teimum 12 milliónum í neyðugum eginpeningi til taks.

Lat Føroya fólk fáa sannleikan at vita.

**Forvitin skattgjaldari**

2. viðgerð 13. apríl. §1 varð samtykt við 22-0 atkvøðum, §2 uttan atkvøðugreiðslu at fara til 3. viðgerð samtykt við 22-0.

3. viðgerð 13. apríl. Uppskotið varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1800-41-2 Lóg nr. 40 frá 15. apríl 1983

---

# 124. Útbyggingarætlanirnar á Nato-herstøðini í Mjørkadali

Ár 1983, hósdagin 10. mars legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi:

Nú ið fram er komið, at »Forsvarets bygningstjeneste« hevur ætlanir um at útbyggja Nato-herstøðina í Mjørkadali, og av tí at slíkar ætlanir eru í stríði við fyrr gjørdar løgtingssamtyktir, seinasta løgtingssamtykt 19. august 1970, tekur løgtingið hesar útbyggingarætlanir til viðgerðar.

Skjal: Løgtingssamtykt 19. august 1970:

»Føroya løgting biður landsstýrið siga ríkisstjórnini frá, at sambært løgtingsviðtøkur frá 13. apríl 1940 er løgtingsins støða, at Føroyar verða hildnar uttan fyri ósemjur londanna millum og hermálsligar samgongur, og at løgtingið sambært løgtingsmáli nr. 14/1960 mótmælir, at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisstøðini, og noktar fyri, at stríðsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.«

1. viðgerð 11. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 16. mars. Uppskotið fall við 13 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Villhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórólvur M. Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Jógvan Olsen og Pauli Ellefsen.

# 125. EDV-skráir (Lm. 81/81)

Ár 1983, mikudagin 18. mai legði serliga edv-nevndin fram soljóðandi

**Álit**

Nevndin mælir til, at serliga EDV-nevndin til viðgerðar av lógum um almennar og privatar skráir heldur fram sum millumtinganevnd til at viðgera málið um privatar skráir liðugt (løgtingsmál nr. 81/1981), og setir sostatt fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Serliga edv-tingnevndin heldur fram sum millumtinganevnd til at viðgera tingmálið um privatar skráir.

2. viðgerð á seinri fundi sama dag. Uppskot til samtyktar frá meiriluta í edv-nevndini samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 535-1

# 126. Vegir og lendingar

Ár 1983, mikudagin 18. mai legði vega- og havnanevndin fram soljóðandi

**Álit**

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt tær o.u. 150 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

## I. Vegir

Á figgjarløgtingslógini eru settar av undir gr. 13.1 60,5 mió. kr. til vegagerðir, umsitingina av landsvegnum o.a.

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

**Uppskot**

Til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra; harumframt til brýr, bilferjulegur o.a. 45.454.400 kr.
Ábøtur til ferðslutrygd á landsvegakervinum 200.000 —
Bundið í ikki nýttum játtanum o.u. 9.231.850 —
Til niðanfyri nevndu vegagerðir 5.613.750 —
60.500.000 kr.

| Kommuna | Til | Studningur 3/4 av kr. |
|---|---|---|
| Fugloyar | Dyrkingarveg á Kirkju ..... | 50.000,00 |
| Svínoyar | Dyrkingarveg eystur í Haga ..... | 75.000,00 |
| | Ábøtur á bygdarvegin ..... | 50.000,00 |
| | Dyrkingarveg í Handantúnstriðing ... | 50.000,00 |
| Hvannasunds | Dyrkingarveg í Hvannasundi ..... | 75.000,00 |
| | Útstykkingarveg í Hvannasundi og Norðdepli ..... | 50.000,00 |
| Klaksvíkar | Veg til minkafarm s.f. Norðoyri ..... | 100.000,00 |
| | Dyrkingarveg í Árnafirði ..... | 100.000,00 |
| | Veg niðan til Gravardal ..... | 50.000,00 |
| Kunoyar | Veg norður á Garðin í Haraldssundi ... | 150.000,00 |
| Mikladals | Veg ..... | 100.000,00 |
| Húsa | Veg til lendingina á Syðradali ..... | 50.000,00 |
| Elduvíkar | Útstykkingarvegir í Elduv. og Funn. .. | 100.000,00 |
| Saksunar | Dyrkingarveg útvið v.s. av Pollinum .. | 75.000,00 |
| Oyndarfjarðar | Dyrkingarveg á Helvtnini ..... | 60.000,00 |
| | Veg og kloakk í s.v. byggiplan ..... | 100.000,00 |
| Fuglafjarðar | Veg til ídnaðar- og sethúsaøki á Kambsdali ..... | 100.000,00 |
| | Veg í Rossagerði ..... | 75.000,00 |
| Leirvíkar | Gerð av bygdarvegi ..... | 100.000,00 |
| | Útstykkingarveg úti á Sýn ..... | 75.000,00 |
| Gøtu | Íbinding í høvuðsveg í Syðrugøtu .... | 75.000,00 |
| | Dyrkingarveg nord Millum Fjarða ... | 75.000,00 |
| | Gongubrúgv um Stórugjógv ..... | 50.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Runavíkar | Veg til Glyvra Kirkju ..... | 50.000,00 |
| | Veg til ellis- og røktarheimið ..... | 150.000,00 |
| | Veg í Byrgi í Søldarfirði ..... | 75.000,00 |
| Nes | Veg í Lágabø á Toftum ..... | 75.000,00 |
| | Veg inni í Saltnesi ..... | 75.000,00 |
| | Veg millum Nes og Toftir ..... | 100.000,00 |
| Skála | Veg í Skálafirði ..... | 50.000,00 |
| | Búsetingarveg Úti á Fløtum ..... | 100.000,00 |
| | Búsetingarveg í Sjóvartúni ..... | 75.000,00 |
| Sjóvar | Brúgv um Blásenda á Selatrað ..... | 100.000,00 |
| | Útstykkingarveg á Strondum ..... | 75.000,00 |
| | Útstykkingarveg í ovaru Follend, Strondum ..... | 50.000,00 |
| Sunda | Húsaveg á Oyri ..... | 50.000,00 |
| | Útstykkingarveg á Oyri ..... | 75.000,00 |
| | Útstykkingarveg á Norðskála ..... | 75.000,00 |
| Eiðis | Dyrkingar- og útstykkingarveg á Kollshjøllum/Meinufløtu ..... | 75.000,00 |
| | Dyrkingarveg og bústaðarveg ..... | 75.000,00 |
| | Dyrkingarveg í Ljósáum ..... | 50.000,00 |
| Gjáar | Dyrkingarvegir í bygdini ..... | 75.000,00 |
| Funnings | Arbeiðið á Svørvisá og breiðkan av ovaru brúgv ..... | 75.000,00 |
| Hvalvíkar | Veg í Hvalvík og Streymnesi ..... | 100.000,00 |
| Hósvíkar | Bústaðarveg ..... | 100.000,00 |
| Kollafjarðar | Útstykkingarveg í Útibø ..... | 75.000,00 |
| | Útstykkingarveg á Signabø ..... | 75.000,00 |
| Kvívíkar | Veg Frammi í Gerði ..... | 75.000,00 |
| | Útstykkingarveg á Stykkinum ..... | 50.000,00 |
| | Ovara veg í Leynum ..... | 50.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Vestmanna | Vegin Mørkin-Heygar ..... | 75.000,00 |
| | Ovara veg Fjørðuni-Gerðisheyggur .. | 75.000,00 |
| Tórshavnar | Dyrkingarveg í Hoyvíkshaganum .... | 75.000,00 |
| | Dyrkingarveg í Kaldbaksbotni ..... (Andr. Pet.) | 50.000,00 |
| | Dyrkingarveg fram í Dal í Kaldbak .. | 75.000,00 |
| Tórsh. Uttanb. | Veg niðan á hamaran ..... | 50.000,00 |
| | Dyrkingarvegir í Syðradali ..... | 75.000,00 |
| Kirkjubøur | Bústaðarvegir í Kirkjubø og á Velbastað ..... | 100.000,00 |
| | Dyrkingarvegir oman frá Mýgandalsá .. | 50.000,00 |
| | Dyrkingarveg suður í Havnardal .... (Ó. J. Müller) | 50.000,00 |
| | Dyrkingarveg út á Bø ..... | 50.000,00 |
| Hests | Veg niðan í Kirkjugarðin ..... | 100.000,00 |
| Nólsoyar | Bústaðarveg ..... | 75.000,00 |
| | Veg til vatngoymslu ..... | 75.000,00 |
| Sandavágs | Bústaðarvegir ..... | 100.000,00 |
| | Brúgv um Tváttá ..... | 100.000,00 |
| Miðvágs | Veg á Tíkarhcyggi ..... | 100.000,00 |
| | Veg í Húsi ..... | 100.000,00 |
| Sørvágs | Veg út gjøgnum Útriðingsbøin . .. | 100.000,00 |
| | Veg til vatngoymslur ..... | 100.000,00 |
| Sands | Dyrkingarveg til Skálsáfjórðing ..... | 75.000,00 |
| | Veg niðan í Traðir ..... | 200.000,00 |
| Skopunar | Veg úr Gerðisvegnum oman í Harðabergslánna ..... | 150.000,00 |
| | Dyrkingarveg oman í Byrgi ..... | 50.000,00 |
| Skálavíkar | Veg inn í Dalatrøðna ..... | 75.000,00 |
| | Veg niðan til Heimastahagarættina .. | 50.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Húsavíkar | Brúnna um Stórá ..... | 125.000,00 |
| | Veg niðan í Gerði í Dali ..... | 50.000,00 |
| Hvalbiar | Dyrkingarveg í Grimsfjallstrøðni .... | 75.000,00 |
| | Dyrkingarveg í Sandvík ..... | 100.000,00 |
| Froðbiar | Brúgv um Gamlansá ..... | 75.000,00 |
| | Byggibúgving (Erik Ahlen økið) ..... | 75.000,00 |
| | Byggibúgving á Brekkunum, Froðba .. | 75.000,00 |
| | Veg í Støðlunum, Froðba ..... | 75.000,00 |
| Hovs | Brúgv um Leivsgarðsá ..... | 100.000,00 |
| | Dyrkingarveg ..... | 50.000,00 |
| Porkeris | Veg út á Gráanvíkshettur ..... | 75.000,00 |
| | Veg oman í Grønadal við Hovsá ..... | 100.000,00 |
| | Veg inni í Bø ..... | 50.000,00 |
| Vágs | Dyrkingarveg norður í Dalin ..... | 75.000,00 |
| | Ovaru brúgv um Gjógvará ..... | 75.000,00 |
| | Vegin til Fámará ..... | 100.000,00 |
| Sunnbiar | Dyrkingarveg á Uttara Bø, Lopra .... | 100.000,00 |
| | Útstykkingarveg í Sunnba ..... | 50.000,00 |
| | Dyrkingarveg eystur undir Eggini .... | 50.000,00 |
| | Tilsamans ..... | 7.485.000,00 |
| | | = 5.613.750,00 |

**Viðmerkingar:**

Í royndunum at bøta um ferðslutrygdina á landsvegakervinum hevur vega- og havnanevndin aftur í ár havt fund við umboð fyri Ráðið fyri ferðslutrygd.

Í hesum sambandi var víst til seinasta álit frá vega- og havnanevndini í fjør, har ávís støð í landsvegakervinum vóru umrødd sum serliga vandamikil, eitt nú vegurin í Streymnesi móti brúnni eins og vegurin við skúlan á Giljanesi og við skúlan við Gøtugjógv.

Tí setti ein samd vega- og havnanevnd tá fram soljóðandi uppskot:

»Landsstýrinum verður álagt at bera so í bandi, at nevndu viðurskifti verða fingin í rættlag.«

Tað vísir seg nú, at einki er gjørt við henda spurning, og tað verður hervið átalað.

Á fundi við Ráðið fyri ferðslutrygd í ár eru eisini onnur vandamikil vegastrekki umrødd, eitt nú landsvegurin gjøgnum Søldarfjørð eins og íbindingin frá nýggja Hotel Føroyum í Oyggjarvegin.

Í Kollfjarðardali er eingin »lummi« til bussin hjá Bygdaleiðum. Tað merkir, at bussurin má steðga á landsvegabreytini, har ferðslan er 80 km í tíman.

Á Stykkinum er tørvur á einum spegili til tess at bøta um útsynið.

Eisini var nevnt, at trupulleikar eru við avmerkingini á landsvegnum.

Av tí at løgtingsins vega- og havnanevnd ásannar, at neyðugt er at gera nakað við ferðslutrygdina, og tað ikki eydnaðist í fjør við eini løgtingssamtykt, hevur ein samd vega- og havnanevnd í ár avgjørt at seta kr. 200.000 til at bøta um ferðslutrygdina við útyvir tað, sum annars verður nýtt. Nevndin áleggur samstundis Landsstýrinum at nýta peningin í tráð við tað, sum omanfyri er nevnt.

2. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið frá nevndini samtykt við 31-0, broytingaruppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

1. juni legði vega- og havnanevndin fram soljóðandi

**Álit**

**II. Lendingar**

Játtanir fyri fíggjarárið 1983/84, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

| **Kommuna** | **Til** | **Studningur 3/4 av kr.** |
|---|---|---|
| Svínoyar | Ljós fram við vegnum um Eiðið (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð .... | 100.000 |
| Viðareiðis | Eiðsvík (planering, asfaltering o.a.) (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð .... | 75.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Hvannasunds | Bátahavn n.f. byrgingina, leinging av bryggjuni við flakav. í Norðdepli og gerð av havnarøki Hvannasundsmegin (Viðareiðis og Hvannasunds Kommunur í felag) (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 400.000 |
| | Gerð av garði og atløgubrúgv í Sandoyarbug, brimgarði í Norðdepli, grótkasti út úr Todnesi, leingja keiina í Norðdepli (2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . | 600.000 |
| Klaksvíkar | Bátahavn í Borðoyarvík (6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt . | 200.000 |
| | 2. byggistig í deksbátahavnini í Árnafirði og regulering av betonglegging við flakavirkið á Kósini (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 400.000 |
| Elduvíkar | Bátahyl í Funningsfirði (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ... | 200.000 |
| | Bátahyl í Funningsfirði (3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ... | 150.000 |
| | Bátadrátt í Elduvík (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 75.000 |
| | Útbygging av havnalagnum og gerð av bátahyli í Funningsfirði (2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt ... | 150.000 |
| Oyndarfjarðar | Veg o.a. í sambandi við deksbátahavn í Oyndarfirði (4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... | 400.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | Deksbátahavn<br>(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 800.000 |
| | Deksbátahavn í Oyndarfirði<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 500.000 |
| Fuglafjarðar | Deksbátahavn<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 300.000 |
| | Smábátahavnina<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| Gøtu | Dýping, reguleringsarbeiði og el-arbeiði<br>(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... | 500.000 |
| | Lendingina í Syðrugøtu<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð .... | 80.000 |
| Runavíkar | Bryggju í Søldarfirði<br>(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... | 300.000 |
| | Havnarlagið á Bakka á Glyvrum<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 200.000 |
| | 50 m atløgubryggju í Søldarfirði<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 300.000 |
| | Ábøtur, víðkan av oljubryggjuni í Søldarfirði<br>(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ... | 150.000 |
| | Bátahyl á Líknargøtu í Saltangará<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ... | 200.000 |
| | Ábøtur á lendingina í Rituvík<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan í gerð) .... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | Ábøtur á lendingina á Gomlustøð í Lamba, t.e. víðkan á bátadráttinum og leinging av pierinum (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... | 150.000 |
| | Meirkostnað av byggjuni í Søldarfirði og veg til hana (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 250.000 |
| Nes | Grótkast s.f. ferjuleguna á Toftum (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 400.000 |
| Skála | Bátahyl í Skálafirði (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ... | 150.000 |
| | Liðugtgerð av bátahyli á Skála (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... | 75.000 |
| Sjóvar | Byggiøki, ferjulega o.a. við Heygsstøð (4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ... | 600.000 |
| | Bátahylin á Selatrað (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| | Bátahylin við Sjógv (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... | 75.000 |
| | Sunda | |
| Sunda | Bátahylá Oyrarbakka (4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 225.000 |
| | Planering fyri nýggjum skeljavirki (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| | Grótkast á Oyri og víðkan um havnarøkið á Oyri (2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð .... | 200.000 |
| | Lennibrúnna við Norðskála (2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð .... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Eiðis | Byggiøki við havnina o.a.<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 800.000 |
| | Bátahavn<br>(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... | 800.000 |
| Hvalvíkar | Atløgusiðu í deksbátahavnini<br>(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| | Verjugarð o.a. við deksbátahavnina<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| | Útbygging av bryggjuni í Hvalvík<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ... | 600.000 |
| Kvívíkar | Bátahavnina í Kvívík<br>(2. ársgjald av 7 ára játtan) í gerð ..... | 600.000 |
| Vestmanna | Bátalegur innan fyri Grønanes og monteringsbryggju við Skipasmiðjuna<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ... | 600.000 |
| | Bátahyl inni á Fjørð<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ... | 200.000 |
| Tórsh. Uttanb. | Bátahavn á Argjum<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 600.000 |
| | Gerð av vegi til og ábøtur á lendingina í Norðradali<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 50.000 |
| Kirkjubøar | Lendingina á Velbastað<br>(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ... | 100.000 |
| Hests | Deksbátahavn í Hesti<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ... | 800.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | Meirstudning til bátaspæl, reststudning til gjørt arbeiði, bátastøð og rudding av bátahyli í Koltri (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| Nólsoyar | 50 m atløgusíðu (4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ... | 400.000 |
| Sandavágs | Veg oman á havnarøki við Giljanes (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 150.000 |
| | Til portur ella til í aðrar mátar at kyrra bátahylin í Sandavági (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ... | 250.000 |
| | Vegin oman á havnarøkið við Giljanes (1. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... | 300.000 |
| Miðvágs | Veg út til brimgarðin á Prestlandinum (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 250.000 |
| | Brimgarð á Prestlandinum (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 600.000 |
| | Bátahylin og veg í Prestlandinum (3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt .... | 175.000 |
| Sørvágs | Atløgupláss í bátahavnini (4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 150.000 |
| Mykines | Ábøtur á veg oman til lendingina (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 50.000 |
| Sands | Regulering av øki í sambandi við fiskiídnaðarbygging og onnur arbeiði við havnarlagið á Sandi (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 600.000 |
| | Havnarvíðkanina (3 ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 300.000 |
| | Havn (2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt .... | 600.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Skopunar | Brúgvagerð um Stóra<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð .... | 150.000 |
| Skálavíkar | Gerð av Mittingabakkanum<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 75.000 |
| Húsavíkar | Vegin til lendingina (ábøtur)<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 100.000 |
| Skúvoyar | Veg niðan frá lendingini<br>(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 225.000 |
| | Vegin frá lendingini upp á bakkan<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... | 200.000 |
| | Vegin av lendingini upp á bakkan<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... | 200.000 |
| Hvalbiar | Eykajáttan til bátahavn o.a. í Nesi<br>(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 250.000 |
| | Arbeiði í sambandi við fiskiídnaðar-bygging við Hamranes<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 600.000 |
| | Lendingina við Neyst<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt ... | 75.000 |
| | Umvæling av lendingini á tanganum í Hvalba (við Neyst)<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 100.000 |
| | Vegin oman á havnarøkið á Hamranesi<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... | 200.000 |
| Hvalbiar | Atløgubryggju úr træi við havnarlagið í Nesi<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ... | 150.000 |
| Tvøroyrar | Liðugtger av bátahavnini<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð .... | 200.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Fámjins | Lendingina<br>(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . . . | 100.000 |
| Hovs | Portur ella grótkast og skifta út teymin<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt . . . | 50.000 |
| Vágs | Bátahyl<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt . . . | 200.000 |
| Sunnbiar | Grótkastið í Lopra<br>(2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . . . | 200.000 |
| | Bátahyl í Pollinum<br>(2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . . . | 200.000 |
| Tórshavn | Bátastøð við Bíggjarstøð í Kaldbak<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð . . . . | 100.000 |
| | Tilsamans 3/4 av . . . . . | 21.355.000 |
| | = | 16.016.250 |
| | Játtan frammanundan fyri 1983/84<br>til lendingar . . . . . | 16.016.250 |
| | Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir<br>pr. 31.03.1983:<br>Av vanligum lendingajáttanum . . . . . | 22.938.950 |
| | | 38.955.200 |

| | | |
|---|---|---|
| Í grunni pr. 01.04.1983: | 26.037.780 | |
| Játtað 1983/84 | 23.000.000 | 49.037.780 |
| Til góðar . . . . . | | 10.082.580 |

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

## UPPSKOT

| Kommuna | Til | Studningur 3/4 av kr. |
|---|---|---|
| Viðareiðis-Hvannasunds | Bátahyl s.f. Todnes<br>3/4 av 200.000 kr./árið í 4 ár ..... | 200.000,00 |
| Hvannasunds | Atkomuveg og planering av havnarøki á Norðtoftum | |
| | 3/4 av 200.000 kr/árið í 6 ár ..... | 200.000,00 |
| | Planering av øki fyri egningasktirum | |
| | 3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár ..... | 100.000,00 |
| Klaksvíkar | Lendingina í Ánunum ..... | 100.000,00 |
| | Bátahyl í Borðoyarvík<br>3/4 av 400.000 kr/árið í 6 ár ..... | 400.000,00 |
| | Leiðings- og áleggingararbeiði á Stongunum<br>3/4 av 130.000 kr/árið í 2 ár ..... | 130.000,00 |
| Kunoyar | Grótkast undir kirkjugarðinum<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 3 ár ..... | 50.000,00 |
| Elduvíkar | Bátadrátt í Elduvík<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| Oyndarfjarðar | Veg til deksbátahavn og til grótbrotið<br>3/4 av 600.000 kr/árið í 2 ár ..... | 600.000,00 |
| Runavíkar | Lendingina í Lamba<br>3/4 av 300.000 kr/árið í 3 ár ..... | 300.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| | Lendingina í Rituvík<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 4 ár ..... | 50.000,00 |
| | Ábøtur á lendingina í Æðuvík<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| | Bátahyl í Líknargøtu<br>3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár ..... | 100.000,00 |
| | Bryggjuna á Bakka á Glyvrum<br>3/4 av 150.000 kr/árið í 3 ár ..... | 150.000,00 |
| Nes | Bátahyl í Oyrunum á Toftum<br>3/4 av 200.000 kr/árið í 5 ár ..... | 200.000,00 |
| Sjóvar | Bátahyl á Selatrað<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| | Pier í Kolbeinagjógv<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| Sunda | Grótkastið á Oyri<br>3/4 av 150.000 kr/árið í 3 ár ..... | 150.000,00 |
| | Lendingina við Norðskála<br>3/4 av 150.000 kr/árið í 4 ár ..... | 150.000,00 |
| | Økið undir Skeljavirkinum og byggibúning<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| Eiðis | Bátahylin við Ljósá<br>3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár ..... | 100.000,00 |
| | Atløguplass til útróðrarbátar á Eiði<br>3/4 av 150.000 kr/árið í 6 ár ..... | 150.000,00 |
| Funnings | Lendingina<br>3/4 av 75.000 kr/árið í 2 ár ..... | 75.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Hvalvíkar | Veg til havna- og ídnaðarøki ..... | 100.000,00 |
| | Deksbátahavnina<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 4 ár ..... | 50.000,00 |
| Hósvíkar | Bátahylin<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 3 ár ..... | 50.000,00 |
| Kollafjarðar | Bátahavnina við Sjógv<br>3/4 av 100.000 kr/árið í 3 ár ..... | 100.000,00 |
| Kvívíkar | Bátahylin í Kvívík<br>3/4 av 400.000 kr/árið í 4 ár ..... | 400.000,00 |
| Kirkjubøar | Lendingina á Velbastað<br>3/4 av 250.000 kr/árið í 3 ár ..... | 250.000,00 |
| Sandavágs | Verju av bátahyli og<br>bátahyl í Sandavági<br>3/4 av 700.000 kr/árið í 4 ár ..... | 700.000,00 |
| Miðvágs | Atløgupláss á Prestlandinum<br>3/4 av 600.000 kr/árið í 4 ár ..... | 600.000,00 |
| Sørvágs | Bátahylin<br>3/4 av 150.000 kr/árið í 6 ár ..... | 150.000,00 |
| | Vitan á Múlanum<br>3/4 av 35.000 kr/árið í 2 ár ..... | 35.000,00 |
| | Radarreflcks og mastur á Skerhólmi<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| Biggjar | Veg niðan frá lendingini í Gásadali ... | 20.000,00 |
| Mykines | Ábøtur á vegin oman í Fjøruna ..... | 50.000,00 |
| Sands | Veg til ferjuleguna<br>3/4 av 250.000 kr/árið í 2 ár ..... | 250.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Skálavíkar | Ábøtur á havnarlagið ..... | 500.000,00 |
| Húsavíkar | Molan á Skarvaskeri<br>3/4 av 150.000 kr/árið í 4 ár ..... | 150.000,00 |
| Hvalbiar | Ábøtur á havnina í Nesi og atløgu-bryggju í bátahylinum í Nesi<br>3/4 av 60.000 kr/árið í 2 ár ..... | 60.000,00 |
| Froðbiar | Bátahylin undir Tvørábakka<br>3/4 av 100.000 kr/árið í 6 ár ..... | 100.000,00 |
| | Umvæling av bátafradrátti í Mølini í Froðba<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 2 ár ..... | 50.000,00 |
| Hovs | Portur ella grótkast og teymar<br>3/4 av 75.000 kr/árið í 6 ár ..... | 75.000,00 |
| Vágs | Ábøtur á lendingina á Nesi<br>3/4 av 50.000 kr/árið í 6 ár ..... | 50.000,00 |
| Sunnbiar | Verju undir Bakkanum og á Mølini<br>3/4 av 250.000 kr/árið í 4 ár ..... | 250.000,00 |
| | Grótkastið í Lopra<br>3/4 av 300.000 kr/árið í 4 ár ..... | 300.000,00 |
| Tórshavnar | Bátahavnina<br>3/4 av 500.000 kr/árið í 4 ár ..... | 500.000,00 |
| | Tilsamans 3/4 av kr..... | 8.345.000,00 |
| | = kr. | 6.258.750,00 |

**Viðmerkiugar:**
Á fíggjarløgtingslógini fyri inniverandi fíggjarár eru avsettar kr. 23 mill. til løgtingsins lendingakonto.

Vega- og havnanevndin hevur í sínum áliti hildið seg innan fyri hesa upphædd, við tað at samlaðu játtanirnar fevna um tilsamans kr. 21.652.500, hetta fyri í sínum lagi at medvirka til, at trýstið á landskassan til lendingakontoina ikki skal økjast ár um ár.

Samsvarandi frammanfyri nevndu uppgerð yvir fíggjarstøðu lendingagrunsins hevur løgtingið 10.082.580,00 kr. at ráða yvir í hesum fíggjarári.

Hinvegin skjýtur nevndin upp at játta 6,259 mió. kr., og er har sostatt avlop uppá 3.823.830,00 mió. kr. at flyta til komandi ár.

Uppskotið frá nevndini vil sostatt meðvirka til at betra um likviditetin og fíggjarstøðuna á løgtingsins lendingakonto.

1. juni løgdu Hans Marius Joensen, Sverre Midjord og Karin Kjølbro fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í uppskoti meirilutans verður

**Kommuna**
Skálavíkar Havnarlagið
500.000 kr. í 1 ár ..... 500.000 kr.

*broytt til*
Skálavíkar Havnarlagið
3/4 av 2.000.000 kr/árið í 4 ár ..... 8.000.000 kr.

2. viðgerð. Uppskot frá havna- og veganevndini samtykt við 31-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Hans Marius Joensen, Sverre Midjord og Karin Kjølbro fall við 14-0 atkvøðum.

# 127. Løgtingslóg um studning til Klaksvíkar, Hvannasunds, Skála, Miðvágs, Skopunar og Hvalbiar kommunur til ávís arbeiði í sambandi við bygging av ídnaðarvirki á havnaøki í avvarðandi kommunu

Ár 1983, mikudagin 18. mai legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um studning til Klaksvíkar, Hvannasunds, Skála, Miðvágs, Skopunar og Hvalbiar kommunur til ávís arbeiði í sambandi við bygging ella útbygging av ídnaðarvirki á havnaøki í avvarðandi kommunu.**

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til niðanfyri nevndu kommunur til at fylla út

**lagtingslov om tilskud til Klaksvíkar, Hvannasunds, Skála, Miðvágs, Skopunar og Hvalbiar kommuner til visse arbejder i forbindelse med etablering eller udbygning af industrivirksomhed på havneareal i vedkommende kommune.**

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til nedennævnte kommuner til opfyldning eller udsprængning

ella spreingja burtur fyri grundøki til avvarðandi havn og byggibúna tað til at regulera og festa øki uttan um ídnaðarbyggingar, soleiðis at viðurskiftini lúka tey krøv, ið galda fyri avvarðandi virki og til onnur tiltøk í sambandi við nútímansgerð av ídnaðarvirki. Studningurin er 75% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 75% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og verður hann goldin við eins stórum ársgjøldum í so nógv fylgjandi fíggjarár, sum niðanfyri er tilskilað, frá og við fíggjarárinum 1983/84 at rokna:

| Kommuna | Áramál | Kr. |
|---|---|---|
| Klaksvíkar | 3 | 3.000.000 |
| Hvannasunds | 2 | 1.800.000 |
| Skála | 2 | 1.500.000 |
| Miðvágs | 4 | 5.200.000 |
| Skopunar | 1 | 300.000 |
| Hvalbiar | 3 | 3.000.000 |
| | | 14.800.000 |

**§2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

for grundareal ved vedkommende havn og til byggemodning af dette, til regulering og befæstelse af arealer uden om industribygninger, så forholdene opfylder de for vedkommende virksomhed gældende krav, samt til andre foranstaltninger i forbindelse med modernisering af en industrivirksomhed. Tilskuddet andrager 75% af anlægsudgifterne, dog højst 75% af nedenfor anførte beløb og udbetales med lige store årsrater i det nedenfor angivne antal på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1983/84 at regne:

| Kommune | Åremål | Kr. |
|---|---|---|
| Klaksvíkar | 3 | 3.000.000 |
| Hvannasunds | 2 | 1.800.000 |
| Skála | 2 | 1.500.000 |
| Miðvágs | 4 | 5.200.000 |
| Skopunar | 1 | 300.000 |
| Hvalbiar | 3 | 3.000.000 |
| | | 14.800.000 |

**§2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Tey arbeiði, lógaruppskotið snýr seg um, verða gjøllari lýst niðanfyri undir hvørjari kommunu sær.

6. *Hvalbiar kommuna:*
Á havnarøkinum við havnina við Hamranes eru bygd fiskavirki og onnur hús í hesum sambandi, og sambært ásetingunum

frá eftirlitsnevndini skal stoypast í 4 m breidd fram við húsunum og plássið rundan um annars verða soleiðis, har lættliga kann haldast reint.

Tað, sum gerast skal, er: betonglegging av 1260 m², asfaltering av 3.600 m² og innilokan av áarløki, sum nú er til tarn fyri ferðsluna á havnarøkinum.

5. *Skopunar kommuna:*

Í Skopun er tørvur á egningarskúrum, og tað er til planering í havnarøkinum fyri tílíkum, peningurin skal nýtast.

4. *Miðvágs kommuna:*

Í fleiri ár hevur verið umrøtt, hvar við havnina pláss skuldi latast til mekaniska verkstaðin hjá J.K. Joensen & Soni.

Hesin verkstaður framleiðir útgerð til fiskivinnuna, setur ymisk tól í skip og umvælir tey og hevur harumframt leingi havt í kvittanum at byggja smærri fiskifør, men higartil havt ringar umstøður at arbeiða undir, tí ov trongligt hevur verið í Miðvágs-Sandavágs havn; at seta í verk skipabygging hevur verið heilt ógjørligt.

Nú brimgarður er gjørdur út frá Prestlandinum og vegur bygdur út har, er møguleiki at gera gott arbeiðisøki fyri nevnda virki, og tað er um studning til at skapa góðar arbeiðisumstøður har, kommunan søkir.

Tey arbeiði, uppskotið fatar um, eru: Regulering, stoyping og asfaltering av økinum, gerð av møguleika fyri uppháling og sjóseting av skipum og spreinging av hellu fyri verkstaði.

1. *Klaksvíkar kommuna:*

Á Kósini í Klaksvík verður gjørt heldur stórt reguleringsarbeiði og í sambandi við ferjuleguna eitt tilkoyringarøki; tann peningur, játtaður varð til endamálini, røkkur ikki; einar 1,6 mió.kr. resta í.

Ætlanin er at flyta oljutangarnar hjá Esso og Shell, sum nú standa ávikavist við Norðborg og á Kósini — oman fyri flakavirkið — norður á Grótrætt. Av játtanini sambært 6 ára havnaætlanini er eftir nóg mikið til at gera atløgu, veg út til hana og spreingja út fyri plássi til tangarnar; men til at gera økið byggibúgvið restar í o.u. 1,4 mió.kr.

3. *Skála kommuna:*

Bryggjan norðan fyri turrdokkina er liðug nú; men peningurin rakk ikki at gera nýggja vegin til bryggjuplássið lidnan og til vissar reguleringar í sambandi við ætlaða bygging.

2. *Hvannasunds kommuna:*

Sunnan fyri Norðtoftir letur Hvannasunds kommuna byggja atløgubrúgv og gera veg til hana.

Inn av hesi brúgv og til báðar síður er ætlan kommununnar at planera byggibúgvið pláss at leiga út til at seta hús á í sambandi við ali- og smoltstøð. Plássið skuldi verið væl egnað til bæði endamálini, tí deils sleppur hvørki alda ella vindvág at har í tílíkan mun, at tað kann verða til bága ella ampa fyri alingina, og deils eru áir har, ið geva nóg mikið av vatni til nokk so stóra smoltstøð.

2. viðgerð 18. mai. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 18. mai 1983 og við 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í 4 minnilutar.

Eftir uppskotinum verður studningurin at veita soleiðis:

| **Kommuna** | **Áramál** | **Kr.** |
|---|---|---|
| Klaksvíkar ..... | 3 | 3.000.000 |
| Hvannasunds ..... | 2 | 1.800.000 |
| Skála ..... | 2 | 1.500.000 |
| Miðvágs ..... | 4 | 5.200.000 |
| Skopunar ..... | 1 | 300.000 |
| Hvalbiar ..... | 3 | 3.000.000 |
| | | **14.800.000** |

Minnilutin (Ivan Johannesen, Sv. Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen) mælir til, at upphæddirnar verða soleiðis, sum fylgir; harav verða játtað 75%:

| Kommuna | Áramál | Kr. |
|---|---|---|
| Klaksvíkar ..... | 3 | 2.000.000 |
| Hvannasunds ..... | 2 | 1.000.000 |
| Skála ..... | 2 | 1.000.000 |
| Miðvágs ..... | 4 | 3.500.000 |
| Skopunar ..... | 1 | 300.000 |
| Hvalbiar ..... | 3 | 2.000.000 |
| | | **9.800.000** |

Minnilutin (Atli Dam og Ove Mikkelsen) heldur, at tær kommunur, ið søkt hava um studning til byggibúning av øki, eiga at fáa somu viðgerð, og mælir tí til, at uppskotið verður aftursent landsverkfrøðinginum til nýggja meting, soleiðis at tær byggingar, har kostnaðarmeting fyriliggur, koma við í eina samlaða ætlan, sum eisini fevnir tær uppskotnu byggingar. Umframt hesar fyriliggja sum kunnugt umsóknir frá Klaksvíkar, Fuglafjarðar, Gøtu, Nes, Sands og Porkeris kommunum.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Málið um byggibúningarstuðul verður aftursent landsverkfrøðinginum til nýggja meting, soleiðis at eisini aðrar umsóknir verða tiknar við í nýggjum uppskoti.

Minnilutin (Hilmar Kass) mælir til í fyrsta lagi, at upphæddirnar, við tí broyting, at landið letur 50% og ikki sum áður 75%, verða soleiðis:

| Kommuna | Áramál | Kr. |
|---|---|---|
| Klaksvíkar ..... | 3 | 3.000.000 |
| Hvannasunds ..... | 2 | 1.800.000 |
| Skála ..... | 2 | 1.500.000 |
| Miðvágs ..... | 4 | 5.200.000 |
| Skopunar ..... | 1 | 400.000 |
| Hvalbiar ..... | 3 | 3.000.000 |
| | | **14.900.000** |

Í øðrum lagi tekur minnilutin (Hilmar Kass) undir við uppskoti minnilutans (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen og Svend Åge Ellefsen).

Tilskilað verður frá omanfyri nevndu, at talan er um tilmæli til endaliga játtan fyri hesi ávísu arbeiði.

Minnilutin (Adolf Hansen) tekur undir við uppskotinum frá landsverkfrøðinginum sum tilskilað í lógaruppskotinum og harumframt eisini við umsóknum um studning, sum tilskilaðar í skrivinum frá landsverkfrøðinginum, dagfest 3. mai 1983 viðvíkjandi studningi til Klaksvíkar kommunu, Fuglafjaðar kommunu, Gøtu kommunu, Nes kommunu, Sands kommunu og Porkeris kommunu.

Nú ætlanir eru frammi um at flyta ferjuleguna í Vestmanna inn í Fjørð, og at ferjan Sam er alt ov lítil at røkja ferðasambandið millum Vágoy og Streymoy, verður mett rættast at kanna, hvat besta framtíðarloysnin viðvíkjandi ferðasambandinum millum Vágoy og Streymoy er.

Tað eru í dag ymiskir tankar frammi, hvussu hetta ferjusamband skal loysast og kann nevnast:

1) ferjulega inni á Fjørð í Vestmanna við nýggjari ferju,
2) ferjulega úti í Vestmannasundi við Norðaru Gjógv og nýta somu ferju,
3) byrging um Vestmannasund uttan siglingarrennu,
4) byrging um Vestmannasund við siglingarrennu,
5) heingibrúgv um Vestmannasund,
6) tunnil undir Vestmannasundi.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at kanna, hvat rætta loysnin er fyri framtíðar ferðasamband millum Vágoy og Streymoy, og hvat kostnaðurin kann metast til.

Formaðurin boðaði 18. mai frá, at hann hevði ráðført seg við Johan Djurhuus, skrivstovustjóra, og gav tinginum frágreiðing og niðurstøðu viðvíkjandi álitinum og málinum um cykajáttan til ávísar havnir.

18. mai løgdu tinglimirnir Jákup Lamhauge og Jógvan I. Olsen fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

Í sambandi við álit frá fíggjarnevndini í løgtingsmáli nr. 127/1982, har fíggjarnevndin skjýtur upp at kanna, hvat besta framtíðarloysnin er viðvíkjandi ferðasambandinum millum Vágar og Streymoy -- har m.a. verður víst á 6 ymiskar loysnir, í kostnaði hundraðtals milliónir, halda tinglimirnir Jákup Lamhauge og Jógvan I. Olsen, at í sambandi við kanningar av framtíðar ferðasambandi millum Vágar (flogvøllin) og meginlandið eigur spurningurin um bygging av nýggjari floghavn á Skorðhædd í Eysturoy — staðið, sum í síni tíð varð hildið at vera best hóskandi fyri tíðarhóskandi floghavn — at verða tikin til viðgerðar av nýggjum.

Vísandi til frammanfyri standandi verður sett fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri at fara undir bygging av flogvølli á Skorðhædd í Eysturoy og leggja úrslitið fyri løgtingið.

Framhaldandi 2. viðgerð 1. juni. Minnilutauppskot frá Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen samtykt við 30-0, §2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð samtykt við 31-0. Uppskot til samtyktar samtykt við 17-0 atkvøðum. Minnilutauppskot frá Ova Mikkelsen og Atla Dam §1 fall við 14-0. Minnilutauppskot frá Adolf V. Hansen §1 fall við 15-0. Minnilutauppskot frá Hilmar Kass fall við 3-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Loyvi at frávíkja tíðarfreistini varð givið. Broytingaruppskotið varð samtykt við 21-0. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0.

Lóg nr. 68 frá 30. juni 1983

# 128. Álit í løgtingslóg um frítíðarundirvísing

Ár 1983, leygardagin 19. mars lagði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m.**

1. táttur
*Hugtak frítíðarundirvísingarinnar*

**§1.** Frítíðarundirvísing v.m. er undirvísing og virksemi, sum verða boðin eftir hesi lóg, ið er givin út sambært rammulóg fyri Føroyar um frítíðarundirvísing v.m.

2. táttur
*Almenn frítíðarundirvísing*

**§2.** Við almenna frítíðarundirvísing í hesi lóg meinast við undirvísing í teimum evnum, sum íbúgvarnir yvir 14 ár í frítíðini ynskja at fáa undirvísing í.

*2. stk.* Landsstýrið kann áseta almennar reglur um almenna frítíðarundirvísing.

**lagtingslov om fritidsundervisning m.m.**

Kapitel 1
*Fritidsundervisningens begreb*

**§1.** Fritidsundervisning m.v. er undervisning og virksomhed tilbudt efter denne lov, der er udstedt i henhold til rammelov for Færøerne og fritidsundervisning m.v.

Kapitel 2
*Almen fritidsundervisning*

**§2.** Ved almen fritidsundervisning forstås i denne lov undervisningen i de emner, hvori befolkningen over 14 år i fritiden måtte ønske undervisning.

*Stk. 2.* Landsstyret kan fastsætte generelle regler om almen fritidsundervisning.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis, herímillum avmarkingar í undirvísingarevnunum.

*4. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann undir serligum umstøðum loyva ungfólki undir 14 ár at luttaka í frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan godkende regler om undervisningens indhold og tilrettelæggelse, herunder begrænsninger i emnekredsen.

*Stk. 4.* Undervisningsdirektoratet kan under særlige omstændigheder tillade unge under 14 år at deltage i fritidsundervisningen efter dette kapitel.

**§3.** Kommunurnar seta á stovn almenna frítíðarundirvísing. Tær einstøku kommunurnar hava skyldu til at tryggja íbúgvunum í kommununi eitt fjølbroytt tilboð um almenna frítíðarundirvísing í einum vavi, sum hóskandi er til viðurskiftini í kommununi. Hetta kann gerast við sjálvstøðugari stovnseting av frítíðarundirvísing, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til frítíðarundirvísing í øðrum kommunum ella við samarbeiði við aðrar undirvísingarstovnar ella felagsskapir.

*2. stk.* Tær einstøku kommunurnar hava skyldu til at taka ímóti íbúgvum úr øðrum kommunum til frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur fyri skyldu kommununnar eftir 1. og 2. stk.

**§3.** Kommunerne etablerer almen fritidsundervisning. De enkelte kommuner har pligt til at sikre kommunens beboere et alsidigt tilbud om almen fritidsundervisning i et efter kommunens forhold rimeligt omfang. Dette kan ske ved selvstændig etablering af fritidsundervisning, ved samarbejde med andre kommuner, ved henvisning til fritidsundervisning i andre kommuner eller ved samarbejde med andre undervisningsinstitutioner eller organisationer.

*Stk. 2.* De enkelte kommuner har pligt til at modtage andre kommuners beboere til almen fritidsundervisning efter dette kapitel.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan godkende regler for kommunens forpligtelser efter stk. 1 og 2.

**§4.** Almenn frítíðarundirvísing skal lúka hesar treytir:

**§4.** Almen fritidsundervisning skal opfylde følgende betingelser:

1) Undirvísingin skal standa øllum í boði.
2) Undirvísingin skal verða løgd til rættis eftir eini ætlan, sum tryggjar, at givin verður ein verulig undirvísing við eini fjølbroyttari lýsing av evninum. Hon kann somuleiðis verða løgd til rættis sum lesiringar, fyrilestrarøðir ella sovorðið.
3) Undirvísingin skal í minsta lagi fevna um 20 tímar í hvørjum evni og í mesta lagi 120 tímar í hvørji lærugrein.
4) Undirvísingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.
5) Lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at kunna undirvísa í viðkomandi evnum.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

1) Undervisningen skal stå åben for alle.
2) Undervisningen skal være tilrettelagt efter en plan, som sikrer, at der gives en egentlig undervisning med en alsidig belysning af emnet. Den kan endvidere tilrettelægges som studiekredse, foredragsrækker eller lignende.
3) Undervisningen skal omfatte mindst 20 timer i hvert emne og højst 120 timer i hvert fag.
4) Undervisningen skal gennemføres i egnede lokaler med fornødent udstyr.
5) Lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at undervise i de pågældende emner.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1.

3. táttur

*Serstøk frítíðarundirvísing*

**§5.** Kommunurnar hava skyldu til í tí vavi, sum tørvur er á, at seta á stovn serstaka frítíðarundirvísing fyri íbúgvarnar yvir 14 ár, sum fevnir um:

1) royndarfyrireikandi undirvísing, sum eftir ynski hjá tí einstaka luttakaranum kann enda við góðkendari roynd ella prógvtøku,
2) yrkiskenda undirvísing, sum miðar ímóti einum ávísum arbeiðsumráði,

Kapitel 3

*Særlig fritidsundervisning*

**§5.** Kommunerne har pligt til, i det omfang, der er behov herfor, at etablere særlig fritidsundervisning for befolkningen over 14 år omfattende:

1) prøveforberedende undervisning, der efter den enkelte deltagers ønske kan afsluttes med godkendt prøve eller eksamen,
2) erhvervsmæssig undervisning med sigte mod et bestemt arbejdsområde,

3) serundirvísing.

*2. stk.* Landsstýrið kann áseta almennar reglur um serstaka frítíðarundirvísing.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis.

*4. stk.* Landsskúlaráðið áseti, um skylda kommununna eftir 1. stk. skal lúkast við sjálvstøðugari stovnseting av undirvísing av hesum slagi, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til undirvísing í øðrum kommunum ella til kommunalar ella ikki-kommunalar skúlar v.m.

§6. Skeiðini skulu lúka hesar treytir:

1) Undirvísingin skal standa øllum í boði.
2) Undirvísingin skal verða løgd til rættis samsvarandi teimum ætlanum, sum eru ásettar fyri viðkomandi lærugrein ella evni.
3) Undirvísingin skal vera ókeypis.
4) Undirvísingin skal fara fram í egnaðum høluni við neyðugum útbúnaði.
5) Lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at geva viðkomandi undirvísing.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

3) specialundervisning.

*Stk. 2.* Landsstyret kan fastsætte generelle regler om særlig fritidsundervisning.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan godkende regler om undervisningens indhold og tilrettelæggelse.

*Stk. 4.* Undervisningsrådet fastsætter, hvorvidt kommunernes pligt efter stk. 1 skal opfyldes ved selvstændig etablering af undervisning af denne art, ved samarbejde med andre kommuner, ved henvisning til andre kommuners undervisning eller til kommunale eller ikke-kommunale skoler m.v.

§6. Kurserne skal opfylde følgende betingelser:

1) Undervisningen skal stå åben for alle.
2) Undervisningen skal være tilrettelagt i overensstemmelse med de planer, der er fastlagt for det pågældende fag eller emne.
3) Undervisningen skal være vederlagsfri.
4) Undervisningen skal gennemføres i egnede lokaler med fornødent udstyr.
5) Lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at give den pågældende undervisning.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde til-

§7. Lærarar á øðrum undirvísingarstovnum v.m. kunnu eftir nærri meginreglum, sum Landsskúlaráðið ásetir, taka á seg ta í hesum tátti nevndu frítíðarundirvísing við samsvarandi niðurskurði í tí skylduga undirvísingartímatalinum á viðkomandi stovni.

§8. Teir næmingar, sum fáa undirvising í samsvarandi lærugrein/um í fólkaskúlanum ella á øðrum undirvísingarstovnum, kunnu bert luttaka í serstakari frítíðarundirvísing eftir hesum tátti við loyvi frá Landsskúlafyrisitingini.

4. táttur
*Frítíðarvirksemi*

§9. Í hvørji kommunu verður við kommunalum ella privatum fyritakssemi sett á stovn frítíðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár sambært reglunum í hesum tátti.

*2. stk.* Býar-/bygdarráðið skal ansa eftir, at tað verður tryggjað børnum og ungfólki undir 25 ár eitt fjølbroytt tilboð um frítíðarundirvísing í einum vavi, sum hóskandi er til viðurskiftini í kommununi.

lade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1.

§7. Lærerne ved andre undervisningsinstitutioner m.v. kan efter nærmere af Undervisningsrådet fastsatte retningslinier overtage undervisningen ved den i nærværende kapitel omhandlede fritidsundervisning med en tilsvarende nedsættelse af det pligtige undervisningstimetal ved den pågældende institution.

§8. Deltagelse i særlig fritidsundervisning efter nærværende kapitel af elever, der modtager undervisning i tilsvarende fag i folkeskolen eller andre undervisningsinstitutioner, kan kun ske efter tilladelse af Undervisningsdirektoratet.

Kapitel 4
*Fritidsvirksomhed*

§9. I hver kommune etableres på kommunalt eller privat initiativ fritidsvirksomhed for børn og unge under 25 år i henhold til bestemmelserne i dette kapitel.

*Stk. 2.* By/bygderådet skal påse, at der sikres børn og unge under 25 år et alsidigt tilbud om fritidsvirksomhed i et efter kommunens forhold rimeligt omfang.

*3. stk.* Landsstýrið kann áseta almennar reglur um frítíðarvirksemi.

*4. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um innihaldið í tilboðnum.

*5. stk.* Kommunan skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, veita studning til frítíðarvirksemi eftir 1. stk.

*Stk. 3.* Landsstyret kan fastsætte generelle regler om fritidsvirksomhed.

*Stk. 4.* Undervisningsrådet kan godkende nærmere regler om tilbudets indhold.

*Stk. 5.* Kommunen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte bestemmelser yde tilskud til fritidsvirksomhed efter stk. 1.

**§10.** Ein kommuna kann góðkenna, at fólk yvir 25 ár luttaka í frítíðarvirksemi av tí slagi, sum umrøtt er í §9.

*2. stk.* Ein kommuna kann somuleiðis góðkenna, at frítíðarvirksemi bert verður skipað fyri fólk yvir 25 ár.

*3. stk.* Landsstýrið kann áseta almennar reglur um frítíðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.

*4. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í frítíðarvirkseminum eftir 1. og 2. stk.

*5. stk.* Landsskúlaráðið góðkennir reglur um, hvussu og í hvørjum vavi kommunurnar kunnu veita studning til frítíðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.

**§10.** En kommune kan godkende, at personer over 25 år deltager i fritidsvirksomhed af den i §9 omhandlede art.

*Stk. 2.* En kommune kan ligeledes godkende, at der etableres fritidsvirksomhed udelukkende for personer over 25 år.

*Stk. 3.* Landsstyret kan fastsætte generelle regler for fritidsvirksomhed efter stk. 1 og 2.

*Stk. 4.* Undervisningsrådet kan godkende regler om indholdet af fritidsvirksomheden efter stk. 1 og 2.

*Stk. 5.* Undervisningsrådet godkender regler for, hvorledes og i hvilket omfang kommunerne kan yde tilskud til fritidsvirksomhed efter stk. 1 og 2.

**§11.** Frítíðarvirksemið skal lúka hesar treytir:

1) Frítíðarvirksemið skal vera lagt til rættis fyri øll og standa øllum í boði eftir almennum metingarstøði.
2) Frítíðarvirksemið skal fara fram í egnaðum hølum ella

**§11.** Fritidsvirksomheden skal opfylde følgende betingelser:

1) Fritidsvirksomheden skal være tilrettelagt for og stå åben for alle efter generelle kriterier.
2) Fritidsvirksomhed skal gennemføres i egnede lokaler el-

á uttandura plássum við neyðugum útbúnaði.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk., eins og hon kann áseta avmarkingar í talinum á tí virksemisslagi, sum tann einstaki við studningsvirkan kann luttaka í.

5. táttur
*Høli v.m.*

**§12.** Bý/bygdaráðið skal eftir reglum, sum Landsskúlaráðið góðkennir, útvega egnað høli ella uttandura pláss við neyðugum útbúnaði til frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi fyri íbúgvarnar.

*2. stk.* Skúlar, onnur egnað høli og uttandura pláss, sum tað almenna eigur, skulu vera til taks ókeypis við ljósi, varma, reingerð, neyðugari umsjón og verandi útbúnaði v.m. í tí vavi, ið er sambæriligt við nýtslu teirra annars.

*3. stk.* Aðrir skúlar, høli og uttandura pláss, sum lands- og/ella ríkiskassin til rakstur og/ella bygging hava goldið lán og/ella studning, skulu við neyðugum útbúnaði og í tí vavi, sum er sambæriligt við nýtslu teirra annars, vera til taks eftir reglum, sum Landsskúlaráðið góðkennir.

ler udendørs anlæg med fornødent udstyr.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1, ligeledes kan det fastsætte begrænsninger i det antal former for virksomhed, den enkelte med tilskudsvirkning kan deltage i.

Kapitel 5
*Lokaler m.v.*

**§12.** By/bygderådet skal efter regler, der godkendes af Undervisningsrådet, tilvejebringe egnede lokaler eller udendørs anlæg med fornødent udstyr til fritidsundervisning og fritidsvirksomhed for beboerne.

*Stk. 2.* Skoler, andre egnede lokaler og udendørs anlæg, der tilhører det offentlige, skal stilles til rådighed vederlagsfrit med lys, varme, rengøring, fornødent opsyn og bestående udstyr m.v. i det omfang, det er foreneligt med deres øvrige brug.

*Stk. 3.* Andre skoler, lokaler og udendørs anlæg, til hvis drift og/eller anlæg der er udbetalt lån og/eller tilskud fra lands- og/eller statskassen, skal med fornødent udstyr i det omfang, der er foreneligt med deres brug, stilles til rådighed efter regler, der godkendes af Undervisningsrådet.

6. táttur

*Fyrisitingarligar reglur*

**§ 13.** Bý/bygdarráðið skal syrga fyri, at kommununnar íbúgvum standa frítíðarundirvísing og -virksemi í boði eftir hesi lóg.

*2. stk.* Bý/bygdarráðið skal áseta á ta árligu fíggjarætlanina rammurnar fyri frítíðarundirvísing eftir 2. tátti og frítíðarvirksemi eftir 4. tátti og hava tey neyðugu fíggjarevni tøk til endamálið.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann áseta eitt minstamark og mesta mark fyri vavið á skyldunum hjá tí einstøku kommunu eftir 2. og 4. tátti.

**§ 14.** Skúlanevndin skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, á hvørjum ári senda uppskot til bý/bygdaráðið um eina ætlan um tilboð um frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi eftir 2. og 4. tátti í hesi lóg. Leiðarin av frítíðarundirvísingini v.m. í kommununi ger uppskotið.

*2. stk.* Um so er, at tann ætlan, ið skúlanevndin sendir bý/bygdarráðnum sbr. 1. stk., ikki fer út um tær rammur, sum eru áscttar á fíggjarætlanini fyri frítíðarundirvísing ella -virksemi eftir ávikavist 2. og 4. tátti, skal bý/bygdarráðið senda hana víðari til Landsskúlafyrisitingina til endaliga góðkenning. Um so er, at ætl-

Kapitel 6

*Administrative bestemmelser*

**§ 13.** By/bygderådet skal drage omsorg for, at der tilbydes kommunens beboere fritidsundervisning og -virksomhed i henhold til denne lov.

*2. stk.* By/bygderådet skal på det årlige budget fastsætte rammerne for fritidsundervisning efter kap. 2 og fritidsvirksomhed efter kap. 4 og stille de fornødne midler til rådighed herfor.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan fastsætte en nederste og en øverste grænse for omfanget af den enkelte kommunes pligter efter kapitel 2 og 4.

**§ 14.** Skolekommissionen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte regler hvert år fremsende forslag til by/bygderådet til en plan for tilbud om fritidsundervisning og fritidsvirksomhed efter nærværende lovs kapitler 2-4. Forslaget udarbejdes af lederen af fritidsundervisningen m.v. i kommunen.

*Stk. 2.* Den af skolekommissionen udarbejdede plan, jfr. stk. 1, skal, såfremt den ikke går ud over de rammer, der er fastsat i budgettet for fritidsundervisning eller -virksomhed efter henholdsvis kapitel 2 og kapitel 4, af by/bygderådet videresendes til Undervisningsdirektoratet til endelig godkendel-

anin fer út um tær ásettu rammur fyri frítíðarundirvísing v.m. eftir 2. ella 4. tátti ella báðum táttum, skal ætlanin, áðrenn hon verður send viðari til Landsskúlafyrisitingina til endaliga góðkenning, viðgerast í bý/bygdarráðnum, sum tekur avgerð um møguligar broytingar í ætlanini í tann mun, hon fer út um tær rammur, sum ásettar eru á fíggjarætlanini.

*3. stk.* Býr/bygdarráðið skal fyriskipa, at tann árliga ætlanin um kommununnar tilboð um frítíðarundirvísing og -virksemi verður send Landsskúlafyrisitingini innan 1. juli.

**§15.** Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, leiða ta frítíðarundirvísing v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglunum í hesi lóg.

*2. stk.* Um so er, at ein kommuna hevur fleiri skúlaleiðarar, men ongan leiðandi skúlastjóra, so tilnevnir kommunan ein av skúlaleiðarunum at taka sær av tí í 1. stk. nevndu uppgávu. Landsskúlaráðið skal góðkenna hesa tilnevning.

*3. stk.* Eftir tilmæli frá tí í 1. stk. nevnda leiðara kann eitt bý/bygdarráð, eftir at tað hevur fingið ummæli frá skúlanevndini, seta leiðaranum eitt ella fleiri hjálparfólk, sum undir eftirliti leiðarans tekur sær av

se. Går planen ud over de fastsatte rammer for fritidsundervisning m.v. for kapitel 2 eller kapitel 4 eller begge kapitler, skal planen, forinden den videresendes til Undervisningsdirektoratet til endelig godkendelse, behandles i by/bygderådet, der træffer beslutning om eventuelle ændringer i planen i det omfang, den overskrider de i budgettet fastlagte rammer.

*Stk. 3.* By/bygderådet skal foranledige, at den årlige plan om kommunens tilbud for fritidsundervisning og -virksomhed indsendes til Undervisningsdirektoratet inden den 1. juli.

**§ 15.** Lederen af en kommunes skolevæsen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte regler lede den fritidsundervisning m.v., der etableres i kommunen efter bestemmelserne i denne lov.

*Stk. 2.* Har en kommune med flere skoleledere ingen ledende skoleinspektør, udpeger kommunen en af skolelederne til at varetage den i stk. 1 nævnte opgave. Den foretagne udpegning skal godkendes af Undervisningsrådet.

*Stk. 3.* Efter indstilling af den i stk. 1 nævnte leder kan et by/bygderåd efter indhentet udtalelse af skolekommissionen ansætte en eller flere medhjælpere for lederen, der under dennes tilsyn varetager de opgaver,

teimum uppgávum, sum eru lagdar á tann eftir 1. stk.

*4. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann áleggja einum bý/bygdarráði at seta leiðaranum eitt hjálparfólk. Setanin fer fram eftir teimum í 3. stk. nevndu reglum.

*5. stk.* Landsskúlaráðið góðkennir tær nærri reglurnar fyri tí virksemi v.m., sum tað í 3. stk. nevnda hjálparfólk kann útinna og fyri eftirlitinum við tí.

*6. stk.* Landsskúlaráðið ásetir setanarkoritti, herímilum somuleiðis lønina hjá leiðarum, hjálparfólki eftir § 15, 3. stk. og lærarum við frítíðarundirvísingina v.m.

**§ 16.** Bý/bygdarráðið og skúlanevndin hava skyldu til at tryggja, at ásetanirnar í hesi lóg verða framdar.

*2. stk.* Tær skyldur, sum bý/bygdarráðið og skúlanevndin hava eftir hesi lóg, kunnu eftir góðkenning Landsskúlaráðsins heilt ella lutvíst latast einum felagsskúlastýri og viðkomandi felagsskúlanevnd ella øðrum kommunalum felagsskapi upp í hendi.

**§ 17.** Landsskúlafyrisitingin skal tryggja neyðuga samskipan millum frítíðarundirvísingina v.m. eftir hesi lóg í teimum einstøku kommunum og millum hesa undirvísing v.m. og undirvísing-

der er pålagt ham efter stk. 1.

*Stk. 4.* Undervisningsdirektoratet kan pålægge et by/bygderåd at ansætte en medhjælper for lederen. Ansættelsen sker efter de i stk. 3 anførte regler.

*Stk. 5.* Undervisningsrådet godkender de nærmere regler for den virksomhed m.v., den i stk. 3 omhandlede medhjælper kan udøve og for tilsynet hermed.

*Stk. 6.* Undervisningsrådet fastsætter ansættelsesvilkårene, herunder tillige aflønningen for ledere, medhjælpere efter § 15, stk. 3, og lærere ved fritidsundervisningen m.v.

**§ 16.** By/bygderådet og skolekommissionen har pligt til at sikre gennemførelsen af bestemmelserne i denne lov.

*Stk. 2.* By/bygderådet og skolekommissionens pligter efter denne lov kan efter godkendelse af Undervisningsrådet helt eller delvist overtages af en forbundsstyrelse respektive forbundsskolekommission eller anden kommunal sammenslutning.

§ 17. Undervisningsdirektoratet skal sikre den fornødne koordination mellem de enkelte kommuners fritidsundervisning m.v. efter denne lov og mellem denne undervisning m.v. og undervis-

ina í øðrum undirvísingarstovnum.

*2. stk.* Landsskúlaráðið kann seta í verk landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m.

7. táttur
*Studningsreglur v.m.*

**§18.** Kommunan rindar allar útreiðslur til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2.-4. tátti í hesi lóg, um so er, at ikki annað er ásett í lóg ella reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin ásetir í hvønn mun, tær goldnu útreiðslurnar kunnu vera góðkendar sum studningsheimilaðar, tíns og hon ásetir, hvussu útreiðslurnar skulu býtast millum tvær ella fleiri kommunur, um so er, at íbúgvarnir í eini kommunu luttaka í frítíðarundirvísing v.m., sum er fyriskipað og góðkend av øðrum kommununm ella stovnum.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna almennar reglur um tey í 2. stk. nevndu viðurskifti.

**§19.** Luttakarar í almennari frítíðarundirvísing eftir 2. tátti skulu rinda eitt gjald, sum Landsskúlafyrisitingin hevur góðkent.

*2. stk.* Luttøka í serstakari frítíðarundirvísing eftir 3. tátti er ókeypis.

*3. stk.* Luttakarar í frítíðar-

ning ved andre undervisningsinstitutioner.

*Stk. 2.* Undervisningsrådet kan iværksætte landsomfattende fritidsundervisning m.v.

Kapitel 7
*Tilskudsregler m.v.*

**§18.** Samtlige udgifter til godkendt fritidsundervisning m.v. efter denne lovs kapitel 2-4 afholdes af kommunen, såfremt ander ikke måtte være fastsat ved lov eller bestemmelser godkendt af Undervisningsrådet.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet fastsætter, i hvilket omfang de afholdte udgifter kan godkendes som tilskudsberettigede, ligesom det fastsætter, hvorledes udgifterne skal fordeles mellem to eller flere kommuner, hvis en kommunes beboere deltager i fritidsundervisning m.v. etableret og godkendt af andre kommuner eller institutioner.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan godkende generelle regler om de i stk. 2 omhandlede forhold.

**§19.** Deltagere i almen fritidsundervisning efter kapitel 2 skal betale et vederlag, der godkendes af Undervisningsdirektoratet.

*Stk. 2.* Deltagelse i særlig fritidsundervisning efter kapitel 3 er vederlagsfri.

*Stk. 3.* Deltagere i fritidsvirk

virksemi eftir 4. tátti skulu sjálvir rinda ein part, sum Landsskúlafyrisitingin hevur góðkent.

**§ 20.** Landskassin veitir studning til útreiðslur kommunanna til virksemi eftir hesi lóg.

*2. stk.* Studningurin er 50% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda, almenna frítíðarundirvísing eftir 2. tátti og 100% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda, serstaka frítíðarundirvísing eftir 3. tátti.

*3. stk.* Til frítíðarvirksemi eftir 4. tátti kann landskassin veita kommunum í mesta lagi 50% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum.

*4. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um, hvør skal bera útreiðslurnar eftir hesi lóg.

**§ 21.** Bý/bygdarráðið skal árliga innan 1. juli senda Landsskúlafyrisitingini ein av grannskoðara kommununnar áteknaðan roknskap fyri góðkent virksemi eftir hesi lóg.

*2. stk.* Við støði í tí grannskoðaða roknskapinum ger Landsskúlafyrisitingin eitt endaligt útreiðslubýti millum kommununa og landskassan.

*3. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann áseta nærri reglur um til-

somhed efter kapitel 4 skal selv afholde en af Undervisningsdirektoratet godkendt andel.

**§ 20.** Af landskassen ydes tilskud til kommunernes udgifter til virksomhed efter denne lov.

*Stk. 2.* Tilskuddet udgør 50% af de tilskudsberettigede udgifter til godkendt almen fritidsundervisning efter kapitel 2 og 100% af de tilskudsberettigede udgifter til godkendt særlig fritidsundervisning efter kapitel 3.

*Stk. 3.* Til fritidsvirksomhed efter kapitel 4 kan landskassen yde kommunerne et tilskud på op til 50% af de tilskudsberettigede udgifter.

*Stk. 4.* Undervisningsrådet kan godkende nærmere regler for afholdelse af udgifterne efter denne lov.

**§ 21.** By/bygderådet skal årligt inden 1. juli til Undervisningsdirektoratet indsende et af kommunens revisor påtegnet regnskab for godkendt virksomhed efter denne lov.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet foretager på grundlag af det reviderede regnskab en endelig fordeling af udgifterne mellem kommunen og landskassen.

*Stk. 3.* Undervisningsdirektoratet kan fastsætte nærmere reg

evningina v.m. av roknskapinum.

8. táttur
*Aðrar ásetingar*

**§22.** Landsskúlafyrisitingin kann veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti til frítíðarundirvísing v.m., allan ella lutvísan stuðul. Hon kann skipa fyri, at skeið verða hildin.

**§23.** Settur verður á stovn ein grunnur, sum kann veita studning og/ella lán til tess at fremja frítíðarundirvísing v.m. eftir hesi lóg.

*2. stk.* Grunninum verður árliga veitt ein peningaupphædd, ið svarar til 5% av øllum studningsheimilaðum útreiðslum til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2.-4. tátti í hesi lóg. Av tí veittu upphæddini rinda kommunurnar 50% og landskassin 50%. Kommunanna partur verður deildur við helvtini eftir íbúgvatali og helvtini eftir skattainntøkuni.

*3. stk.* Í grunnin koma somuleiðis rentur og avdráttir av teimum lánum, sum grunnurin hevur veitt, eins og tær serstøku árligu játtanir, ið ásettar eru á fíggjarlógini.

*4. stk.* Landsstýrið ásetir viðtøkurnar fyri grunnin.

ler for regnskabets udformning m.v.

Kapitel 8
*Andre bestemmelser*

§22. Undervisningsdirektoratet kan yde hel eller delvis støtte til lederes og læreres deltagelse i uddannelseskurser med henblik på fritidsundervisning m.v. Det kan foranledige kurser afholdt.

**§23.** Der oprettes en fond, hvoraf der kan ydes tilskud og/eller lån til fremme af fritidsundervisning m.v. efter denne lov.

*Stk. 2.* Der tilskrives årligt fonden et beløb svarende til 5% af samtlige tilskudsberettigede udgifter til godkendt fritidsundervisning m.v. efter denne lovs kapitel 2-4. Det tilskrevne beløb afholdes med 50% af kommunerne og 50% af landskassen. Kommunernes andel fordeles med halvdelen efter indbyggerantal og halvdelen efter skatteindtægter.

*Stk. 3.* I fonden indgår tillige renter og afdrag på de af fonden ydede lån samt de særlige på finansloven fastsatte årlige bevillinger.

*Stk. 4.* Landsstyret fastsætter vedtægterne for fonden.

9. táttur
*Ásetanir um,*
*nær lógin fær gildi v.m.*

**§24.** Henda lóg fær gildi 1. august 1982.

*2. stk.* Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstudning til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935, fer samstundis úr gildi.

Kapitel 9
*Ikrafttrædelsesbestemmelser*
*m.v.*

**§24.** Denne lov træder i kraft 1. august 1982.

*Stk. 2.* Bekendtgørelse nr. 9 af 22. januar 1931 om tilskud fra staten til ungdoms- og aftenskoler på Færøerne, jfr. bekendtgørelse nr. 276 af 7. oktober 1935, ophæves samtidig.

**Viðmerkingar:**

Tær reglur, sum eru galdandi fyri frítíðarundirvísing (kvøldskúlan) eru frá 1931 og 1935 og hava leingi verið ótíðarhóskandi. Spurningurin um at nútímansgera lóggávuna á hesum øki hevur fleiri ferðir verið viðgjørdur á tingi, men hevur ikki vunnið frama.

Í 1972 setti landsstýrið eftir áheitan frá Føroya Skúlastjórn ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina nýggja frítíðarlóggávu.

Arbeiðsbólkurin handaði í 1975 landsstýrinum eitt uppskot til »Lov for Færøerne om fritidsundervisning m.v.«

Aftaná at løgtingslóg um skúlafyrisiting var samtykt á heysti 1978, broytti arbeiðsbólkurin uppskotið og handaði tann 14. apríl 1979 landsstýrinum álit í málinum (sí skjal 1).

Uppskotið til løgtingslóg er gjørt við heimild í »lov for Færøerne om fritidsundervisning m.v.«, tí sonevndu rammulógini (sí skjal 2), og eftir §9 í hesi lóg er tað heimastýrið, ið ásetir nærri reglur um frítíðarundirvísing v.m.

Løgtingslógaruppskotið fevnir um tey trý sløgini av frítíðarundirvísing og -virksemi, sum eru umrødd í rammulógini.

*Tann almenna frítíðarundirvísingin* (2. táttur í løgtingslógaruppskotinum) svarar til ta vanligu kvøldskúlaundirvísingina, soleiðis sum vit kenna hana í dag.

*Tann serstaka frítíðarundirvísingin* (3. táttur) fevnir um royndarfyrireikandi undirvísing í serstøkum lærugreinum v.m., yrkiskenda undirvísing og serundirvísing. Slíka frítíðarundirvísing hevur bert lítil møguleiki verið fyri at veitt eftir galdandi reglum. Tey seinastu árini hava myndugleikarnir tí í ein vissan mun tulkað galdandi reglur soleiðis, at tað hevur verið gjørt møguligt fyri kvøldskúlan at givið

undirvísing, ið miðaði ímóti goðkendari roynd. Í slíkum førum eru næmingarnir farnir upp til prógtøku sum privatistar á skúla ella stovni, sum hevur rætt til at halda prógtøkur, samanber nevndarálit síðu 11.

*Frítíðarvirksemi fyri ung* (4. táttur) er nakað nýtt. Tað skal tó viðmerkjast, at markið millum almenna frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi í sumnum førum er ringt at seta, og hava myndugleikarnir tí í ein vissan mun goðkent undirvísing eftir teimum galdandi reglunum fyri kvøldskúlan, sum, um reglurnar í hesum løgtingslógaruppskoti høvdu verið galdandi, hevði verið mett sum frítíðarvirksemi.

Eins og fólkaskúlalógin skal lógaruppskotið um frítíðarundirvísing v.m. í stóran mun verða fylt út við almennum fyriskipanum gjørdar av landsstýrinum ella Landsskúlaráðnum.

Løgtingslógaruppskotið gevur ta formligu heimildina at leggja allar møguleikarnar fyri frítíðarundirvísing og -virksemi undir løgtingslógina, men spurningurin um, hvat til eina og hvørja tíð verður tikið við, verður partvíst avgjørdur av teimum árligu játtanunum á løgtingsfíggjarlógini, partvíst av teimum einstøku kommununum.

Í skjali 3 er gjørt eitt yvirlit yvir *lærugreinir/evni í kvøldskúlanum undir núverandi skipan*. Ein gjøgnumgongd av lærugreinum/evnum, ið hava verið góðkend í kvøldskúlanum tey seinastu 10 árini, vísir, at vaksið er um skeiðstilboðini í stóran mun. Tað er lagdur størri dentur á tey bókligu fakini, eins og tey »musisku« fakini fevna um eitt størri øki.

Eisini er ein broyting farin fram í býtinum av monnum og kvinnum, ið luttaka í frítíðarundirvísing, smb. álitið s. 12.

*Hvat viðvíkur serstakari frítíðarundirvísing* eftir 3. tátti í lógaruppskotinum kann væntast, at vavið av hesi undirvísing fer at vaksa soleiðis, at undirvísingin í framtíðini fer at fevna um fleiri lærugreinir/evni, enn hvat higartil hevur kunnað verið góðkent eftir kvøldskúlaskipanini.

*Viðvíkjandi frítíðarvirksemi* verður víst til síðu 15 í álitinum.

Tað er Landsskúlafyrisitingin, ið eigur at ansa eftir, at játtanir á fíggjarløgtingslógini verða hildnar. Soleiðis er tað fíggjarløgtingslógin, sum kemur at seta hægsta mark fyri vavinum á stuðulsheimilaðari frítíðarundirvísing ár undan ári.

Tær einstøku kommununurnar hava møguleika innan fyri ásetingarnar í lógini sjálvar at avgera, hvussu nógv tilboð tær vilja geva íbúgvunum í kommununi um frítíðarundirvísing v.m. Tær einstøku

kommunurnar skulu tó eftir áseting um í rammulógini koma við einum fjølbroyttum tilboði, ið er rímiligt eftir viðurskiftunum.

Lógaruppskotið hevur *tvey týdningarmikil endamál.* Annað er tað undirvísingarliga, hitt tað sosiala.

*Tað undirvísingarliga endamálið* er, at frítíðarundirvísingin, tann almenna eins og tann serstaka, skal nøkta ein part av tørvinum fyri undirvísing hjá íbúgvunum í kommununi, ein tørv, tey kanska ikki hava havt møguleikar fyri at fingið nøktaðan frammanundan.

Ein annar týðandi undirvísingarligur táttur er samarbeiðið við fólkaskúlan. Við at kanna §3 í fólkaskúlalógini sæst, at møguleiki er fyri, at fólkaskúlanæmingar kunnu fáa ein part av undirvísing teirra m.a. sum frítíðarundirvísing, av tí at hetta kann vera tann einasti møguleiki fyri at skipa bólkar, sum hava eina rímiliga stødd. Um hesin møguleikin ikki fanst, høvdu hvørki fólkaskúlanæmingar ella tey, sum ynsktu hesa undirvísing sum frítíðarundirvísing, havt høvi at fingið undirvísing orsakað av ov lítlari luttøku frá báðum pørtum.

Harumframt hevur frítíðarundirvísingin v.m. eisini *stóran sosialan týdning*. Hetta er serstakliga galdandi fyri partar av tí serstøku undirvísingini, men gevur frítíðarundirvísing v.m. sum heild eisini fólki møguleika fyri at koma saman, ein møguleika, sum kanska nógv av teimum annars ikki høvdu havt.

*Hvat viðvíkur frítíðarvirksemi,* so gjalda í dag verandi feløg eina stóra upphædd til hetta virksemi fyri børn og ung, og lata landskassin og kommunurnar munandi stuðul til virksemi hjá hesum feløgum.

Hetta er tó ikki nóg mikið. Teir møguleikar, sum eru, eiga at verða útbygdir, og nýggir møgulcikar eiga at verða stuðlaðir, so at ungdómurin kann fáa fjølbroyttar møguleikar fyri frítíðarvirksemi.

Sum áður sagt, er hesin partur av lógaruppskotinum heilt nýggjur, og er tað tí torført at meta um útreiðslurnar. Nevndin hevur í álitinum á síðu 27 mett útreiðslurnar til frítíðarvirksemi til 2,5 mió.kr.

Viðmerkjast kann, at henda meting er grundað á eitt tímatal uppá 50.000 um árið, og má hetta metast at vera høgt sett.

Av tí at virksemið eftir 4. tátti er so fjølbroytt, hevur landsstýrið broytt §20 í løgtingslógaruppskotinum í álitinum soleiðis, at stuðul til hetta virksemi kann latast við í mesta lagi 50% av kostnaðinum.

Sum tað framgongur av nevndarálitinum síðu 19, so hugsar nevndin sær, at við luttøku í almennari frítíðarundirvísing verður goldið eitt hægri gjald av luttakarunum enn higartil. Tó skal viðmerkjast, at fleiri kommunur í skúlaárinum 1981/82 hava hækkað

luttakaragjaldið so mikið, at tað fyri summar greinir er hægri, enn hvat nevndin hevur hugsað sær.

Sambært løgtingslógaruppskotinum hevur kommunan skyldu til at seta serstaka frítíðarundirvísing á stovn, men Landsskúlaráðið kann áseta, at kommunan fremur skyldur sínar á annan hátt, samanber s. 15. í álitinum. Allar útreiðslurnar til hesa frítíðarundirvísing verða endurgoldnar úr landskassanum.

Eftir §23 í uppskotinum verður ein grunnur settur á stovn. Grunninum verður árliga veitt 5% av øllum studningsheimilaðum útreiðslum til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2.-4. tátti í hesi lóg.

Av tí veittu upphæddini verða 50% rindað av kommununi og 50% úr landskassanum, sí álitið síðu 21. Fæ grunnsins kann m.a. nýtast til studning til kommunur, ið eru illa fyri, til skeið fyri lærarar og leiðarar, til landsumfatandi frítíðarundirvísing og til lán og/ella studning til bygging av t.d. ungdómshúsum.

Tað er torført at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum, men verður víst til síðurnar 29-32 í álitinum. Samandrátturin á síðu 29-30 eigur orsakað av teim hækkaðu lønunum at verða hækkaður við uml. 30%.

Í inniverandi fíggjarári er samlaði kostnaðurin av frítíðarundirvísingini mettur til at verða 4.600.000 kr. Herav er landskassans partur 1.072.000 kr.

Í skúlaárinum 1980/81 fevndi kvøldskúlaundirvísingin um 39.000 tímar. Um løgtingslógaruppskotið hevði verið lóg, høvdu 27.000 tímar verið lisnir sum almenn frítíðarundirvísing, 4.000 tímar sum serstøk frítíðarundirvísing, og 8.000 tímar høvdu komið undir frítíðarvirksemi. Samlaðu útreiðslurnar av kvøldskúlaundirvísingini í 1980/81 vóru umleið 4,3 mió.kr., harav landskassans partur var umleið 1,0 mió.kr.

Landsstýrið hevur sent Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu uppskotið til løgtingslóg um frítíðarundirvísing til ummælis. Hesi hava svarað aftur ávikavist 12. og 15. mars 1982, jbr. viðløgdu skjøl 4 og 5. Stundir hava ikki verið hjá landsstýrinum at umhugsa hesi ummæli, men verður mælt til, at landsstýrið fær høvi til at viðgera ummælini saman við tí løgtingsnevnd, ið fær málið til ummælis.

*Sí skjal 20A*

16. mai legði skúlanevndin fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram á ting av landsstýrinum tann 19. mars 1982 sum løgtingsmál nr. 163/1981 og varð við 1. viðgerð 1. apríl 1982 beint í skúlanevndina.

Skúlanevndin viðgjørdu málið, og í áliti dagfest 2. apríl 1982 mælti ein samd nevnd til, at skúlanevndin varð gjørd til millumtinganevnd, so at Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommuna kundu fáa høvi til at seta fram síni sjónarmið í málinum, og tilskilað varð, at nevndin síðani fór at kunna leggja fram álit sítt í ólavsøkutingsetuni.

Sambært álitinum II dagfest 27. apríl 1982 hevði skúlanevndin viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Óli Breckmann, Ivan Johannesen, Guttorm Klein og Finnbogi Isaksen) mælti til, at skúlanevndin varð gjørd til millumtinganevnd, so at Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommuna eftir umbøn kundu fáa høvi til at seta fram síni sjónarmið í málinum, og tilskilað varð, at nevndin síðani fór at kunna leggja fram álit sítt í ólavsøkutingsetuni.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) mælti til, at málið varð avgreitt í tingsetuni 1981.

Við 2. viðgerð 28. aprfl 1982 samtykti tingið við 26-0 atkvøðum, at skúlanevndin varð gjørd til millumtinganevnd.

Í endanum av viðmerkingunum til løgtingsmálið verður upplýst, at landsstýrið hevur sent Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu uppskotið til løgtingslóg um frítíðarundirvísing til ummælis, og at hesir hava svarað aftur ávikavist 12. og 15. mars 1982, og víst verður til skjøl 4 og 5 til løgtingsmálið. Landsstýrið sigur víðari, at stundir hava ikki verið hjá landsstýrinum at umhugsa hesi ummæli, men verður mælt til, at landsstýrið fær høvi til at viðgera ummælini saman við tí løgtingsnevnd, ið fær málið til ummælis.

Skúlanevndin hevði sostatt 25. juni 1982 ein fund við umboð fyri Føroya Kommunufelag og Tórshavnar býráð, har hesi løgdu síni sjónarmið fram.

Á einum fundi 2. juli 1983 við Eilif Samuelsen, landsstýrismann, Arnold Abrahamsen frá landsskúlafyrisitingini og A.J. Arnskov, skrivstovustjóra, sum hevði verið við í arbeiðinum at gera uppskotið til løgtingslóg um frítíðarundirvising, greiddi skúlanevndin síðani

frá úrslitinum av fundinum við Føroya Kommunufelag og Tórshavnar býráð nú høvdu sett ein bólk, sum skuldi gera sítt egna uppskot til eina løgtingslóg um frítíðarundirvísing.

Skúlanevndin heitti eftir hesum á Føroya Kommunufelag og Tórshavnar býráð um at skipa fyri, at bólkurin skuldi nýta tað fyriliggjandi uppskotið til løgtingslóg um frítíðarundirvísing heldur enn at gera eitt heilt nýtt uppskot, tí ætlanin var at miða ímóti, at lógin kundi verða samtykt og sett í gildi 1. august 1983, uttan at neyðugt skuldi verða at viðgera uppskotið í millumtinganevnd eina ferð aftrat.

Á fundinum 14. februar 1983 varð avtalað at halda ein fund 26. februar 1983, har skúlanevndin, landsstýrið, landsskúlafyrisitingin, Føroya Kommunufelag og Tórshavnar býráð og heruppií bólkurin, sum hesi bæði seinast nevndu høvdu sett, kundu vera umboðað, og har teir ivaspurningar í uppskotinum til løgtingslóg um frítíðarundirvísing, sum enn máttu vera eftir, kundu verða greiddir.

Fundurin 26. februar 1983 varð hildin sum ætlað, og eftir áheitan frá Meginfelag Ungmannafelaga Føroya hevði skúlanevndin 11. apríl 1983 eisini ein fund við umboð fyri hetta meginfelagið, har umboð fyri Landsskúlafyrisitingina somuleiðis luttóku.

Eftir at skúlanevndin hevði móttikið tað uppskot til løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m., sum felagsbólkurin hjá Tórshavnar býráð og Føroya Kommunufelag hevði gjørt, og skúlanevndin hevði havt høvi til at gjøgnumganga hetta og við hjálp frá A.J. Arnskov samarbeiða tað uppskotið við upprunaliga uppskot landsstýrisins, var 22. apríl 1983 enn ein fundur hildin við umboð frá Tórshavnar býráð og Føroya Kommunufelag um hetta umarbeidda uppskotið, og eftir samráð millum skúlanevndina, Eilif Samuelsen, landsstýrismann, og Landsskúlafyrisitingina er hjálagda uppskot til løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m., sí skjal 1, at enda útarbeitt út frá teimum samráðingum, sum skúlanevndin hevur havt undir viðgerðini av málinum.

Undir viðgerðini av hesum tingmáli hevur høvuðssjónarmiðið hjá Tórshavnar kommunu og Føroya Kommunufelag verið, at hesi í uppskoti landsstýrisins til løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m. sóu ein vanda fyri, at skúlamyndugleikar landsins í alt ov stóran mun skulu kunna taka sjálvsavgerðarrættin frá kommununum, stórum sum smáum, og kunnu áleggja teimum tiltøk, sum tær sjálvar ikki meta rímilig.

Høvuðssjónarmiðið hjá Meginfelag Ungmannafelaga Føroya hevur

verið, at meginfelagið og limafeløg tess vilja varðveita rættin til sjálvstøðugt at taka avgerðir um og reka feløg síni, men hin vegin fegin vilja verða tikin við í ráðgeving og vegleiðing um spurningar, sum hava týdning fyri virksemi felaganna, her uppií tí nærri reglur skulu gerast um frítíðarvirksemi sambært 4. tátti í uppskotinum til løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m. Herumframt er meginfelagið av teirri áskoðan, at meginreglan um 25-ára markið í samband við frítíðarvirksemi eigur at verða tikin burtur.

Um tær einstøku táttirnar í hjálagda løgtingslógaruppskoti hava Tórshavnar býráð og Føroya Kommunufelag lagt stóran dent á at fáa hesi sjónarmið fram:

**2. táttur:**

*§3, 1. stk.:* Upprunaliga ynskið var, at eitt pkt. 6) skuldi setast í løgtingslógaruppskotið við hesi orðing: »Luttakarar skulu bert hava loyvi til í serligum førum og tí undir serligum treytum at vera við á sama skeiði meira enn einaferð«, og við »skeið« varð meint við undirvísing t.d. á byrjunarstigi ella øðrum ella triðja stigi. Ætlanin er at forða fyri, at teir somu luttakararnir ár út og ár inn fáa frítíðarundirvísing av sama slagi, og hetta eigur heilt greitt at verða ásett í teimum nærri reglum, sum verða gjørdar við heimild í lógini, t.d. á tann hátt, at framhald av frítíðarundirvísing út yvir 2 ár á sama skeiði bert kann fara fram undir skipanini fyri frítíðarvirksemi.

*§3, 2. stk.:* Kommunurnar ynsktu her hesa orðing: »Í serstøkum førum kunnu frávik verða gjørd frá reglunum í 1. stk.« Líknandi orðingar ynsktu kommunurnar eisini í §5, 3. stk., og §7, 2. stk. Kommunurnar meta slíka orðing vera meira í tráð við tann veruleika, at frítíðarundirvísing v.m. er ein kommunal uppgáva, ið kommunurnar undir ábyrgd røkja. Verða frávikini mett órímilig, kann landsskúlafyrisitingin sýta fyri at veita stuðning. Tað er upp til kommunurnar, um tær gjøgnumføra hesa frítíðarundirvísing uttan stuðning.

**4. táttur:**

Tað frítíðarvirksemi, sum í dag í fleiri kommunum er bygt upp út frá gomlu kvøldskúlalógini, kann verða varðveitt og útbygt. Bæði tað undirvísingarliga og tað sosiala aspektið verða tryggjað her,

men gjaldið fyri luttøku í hesum frítíðarvirksemi eigur at vera hægri enn við vanligu frítíðarundirvísingina.

Í aðrar mátar eiga kommunurnar sjálvar at taka avgerð um, í hvønn mun og á hvønn hátt tær skulu stuðla privatum frítíðarvirksemi. Tó eiga kommunurnar at verða eggjaðar til at gera reglur um henda stuðul, sbr. reglugerðina hjá Klaksvíkar býráð, sum er hjáløgd sum skjal 2.

**5. táttur:**

Kommunurnar hava einki at viðmerkja til, at tær hava eina principiella skyldu at útvega høli v.m. til frítíðarundirvísing, men av tí at skúlar v.m. í fyrsta lagi verða nýtt, ynsktu kommunurnar, at 1. stk. varð sett sum 3. stk. 1. stk. varð herumframt gjørt veikari fyri at tryggja, at landsskúlamyndugleikarnir ikki við hesi lóg skuldu noyða kommunurnar inn í bygging av felagsítróttarhøll.

**6. táttur:**

Fleiri greinir við fyrisitingarligum reglum í løgtingslógaruppskoti landsstýrisins eiga at verða og eru strikaðar í hjálagda løgtingslógaruppskoti og kunnu í staðin verða settar í kunngerð og aðrar ásetingar.

*§13, 2. stk.:* Upprunaliga ynskið var, at kommunan skuldi kunna tilnevna ein serstakan skúlaleiðara at leiða frítíðarundirvísingina v.m. eftir §13, 1. stk. Kann hetta ynski ikki verða uppfylt við tí tí grundgeving, at neyðugt er at samskipa leiðsluna av kommununnar skúlaverki og leiðsluna av frítíðarundirvísingini v.m., má treytin vera, at tann skipanin viðvíkjandi leiðsluni av kvøldskúlaundirvísingini, sum Tórshavnar kommuna higartil hevur havt, kann halda fram og nýtast aðrastaðni, t.e. at tann, sum fær dagligu leiðsluna av frítíðarundirvísingini v.m. um hendi, sjálvstøðugt útinnir hetta arbeiðið, formliga sum hjálparfólk hjá leiðaranum smbt. §13, 3. stk., smb. 2 og 1. stk. og undir eftirliti hansara.

*§13, 4. stk.* eru Tórshavnar býráð og Føroya Kommunufelag principielt ímóti.

*§14, 3. stk.* er neyðugt, fyri at kommunurnar kunnu hava vissu fyri, at tær — um hetta er hentast og við loyvi frá landsskúlafyrisitingini — sjálvar sleppa at taka sær av frítíðarundirvísing v.m. aftanfyri samstarv við felagsskúlastýrið, felagsskúlanevnd ella annan kommunalan felagsskap.

*§15, 2. stk.:* Tórshavnar býráð og Føroya kommunufelag ynskja ikki hesa ásetan uttan so, at tað samstundis verður gjørt heilt greitt, at kommunurnar einki skulu gjalda til hesi tiltøk og ongar útreiðslur

ſáa av teimum. Landsstýrið hevur upplýst, at tað snýr seg um sjónvarps- og útvarpssendirøðir.

*§16:* Í teimum reglum, sum landsskúlaráðið ásetir, eigur greiniliga at verða tilskilað, hvussu og nær ætlanin verður at senda inn, og at kommunan fær fráboðan um fulla ella lutvísa góðkenning av ætlanini og studningsveitan til hesa, so at kommunan um neyðugt í góðari tíð kann broyta ætlan sína og ſáa góðkenning og fígging samsvarandi. Hesar reglur eru greiniliga uppsettar í lógaruppskotinum frá felagskommunalu nevndini, og har er eisini gjørt greitt, at tað eru kommunurnar, ið taka avgerð um, hvørt tær gjøgnumføra frítíðarundirvísing v.m. í størri vavi, enn studningur frá landskassa svarar til. Landsskúlamyndugleikarnir eiga ikki at kunna forða kommunum í at gjøgnumføra frítíðarundirvísing v.m., ið skúlamyndugleikarnir á staðnum hava góðkent. Henda undirvísing v.m. er tó bert studningsheimilað í tann mun, landsskúlamyndugleikarnir hava góðkent hana sum slíka.

**7. táttur:**

*§17, 2. stk.:* Sum studningsheimilaðar útreiðslur av frítíðarundirvísing eftir 2. og 3. tátti eiga at góðkennast allar læraralønir og lønir til hjálparfólk, neyðugar ferðaútreiðslur hjá lærarum, leiðarum og hjálparfólki og aðrar útreiðslur eftir reglum, ið landsskúlaráðið hevur góðkent. Einans nettoútreiðslur kommunanna til læraralønir v.m. sbr. viðmerking til §18, 3. stk., kunnu roknast sum studningsheimilaðar útreiðslur av frítíðarundirvísing.

*§18, 1. stk.:* Gjaldið verður ásett av kommuni fyri nýtslu av hølum við ljósi, hita reingerð, neyðugari umsjón, møguligari leigu v.m. Og gjaldið kann verða ymiskt fyri ymiskar aldursbólkar og ymisk undirvísingarevni. Sæð undir einum skulu kommunurnar ikki fáa vinning av hesum gjaldi, og skal tað heldur ikki vera so stórt, at avlop skal vera av tí til gjald av studningsheimilaðum útreiðslum. Mett verður, at uppskot frá landsskúlafyrisitingini, sum skal góðkenna gjaldið, um gjald út frá hesum reglum vil verða nýtt av øllum kommunum.

*§18, 3. stk.:* Hetta gjald er ætlað hægri enn tað gjald, ið skal latast fyri frítíðarundirvísing eftir 2. tátti, tí her skal gjaldið eisini ganga til ískoyti til tilrættalegging og leiðara- og læraralønir v.m.

Nevndin er samd um, at tá lógin er samtykt, eiga viðmerkingarnar frá kommununum at vera leiðbeinandi í umsitingini av lógini. Nevndin er samd við kommunurnar í tí, at frítíðarundirvísing v.m. fyrst og fremst er kommunalt mál. Við hesari lóg eiga kommunurnar

at verða eggjaðar til at taka sær meira av hesi kommunalu uppgávu, ið — eftir tí útviklingi, ið sæst aðrastaðni — sum frá líður fer at vera borin av kommununum einsamøllum. Nevndin leggur tí við sum skjal 3 og 4 skrivið og uppskotið frá felagskommunalu nevndini.

Umframt frammanfyri umrøddu broytingar í hjálagda løgtingslógaruppskoti í mun til uppskot landsstýrisins skal skúlanevndin nevna, at av meiri týðandi broytingum er í 8. tátti í uppskoti landsstýrisins §23 um ein grunn til at fremja frítíðarundirvísing v.m. strikað.

Í viðmerkingum landsstýrisins til løgtingsmálið nr. 163/1981 verður sagt, at torført er at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum, og víst verður til síðurnar 29-32 (skal vera 25-27) í álitinum, tó so at samandrátturin á síðu 29-30 (skal vera 25-26) tá – – tað var í mars 1982 —orsakað av teimi hækkaðu løgunum átti at verða hækkaður við umleið 30%.

Víðari sigur landsstýrið, at í fíggjarárinum 1981/82 var samlaði kostnaðurin av kvøldskúlaundirvísingini mettur til 4.600.000 kr. og av hesum landskassans partur til 1.072.000 kr., og fevnir henda útreiðsla um umleið 8.000 luttakarar.

Roknskapartalið fyri 1981/82 var 1.273.000 kr.

Á fíggjarløgtingslógini 1983/84 er játtanin til »Kvøldskúlar« 1.563.000 kr.

Eftir hesum hevur skúlanevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Óli Breckmann, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) mælir løgtinginum til at samtykkja hjálagda uppskot til løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m., skjal 1.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard) harmast um ta viðferð, uppskotið um frítíðarlóg hevur fingið frá samgonguflokkunum í skúlanevndini.

Uppskotið um frítíðarlóg var skilagott, og skilagóð uppskot frá borgarligu samgonguni hava sum heild verið fá. Tað er tí so mikið meira harmiligt, at tað hevur eydnast afturhaldskreftunum at dráta so leingi við málinum og harnæst at gera so stórar broytingar í upprunauppskotinum, at talan í roynd og veru er um eitt nýtt lógaruppskot.

Minnilutin metir framvegis, at upprunauppskot landsstýrisins væl kann nýtast sum grundarlag undir einum góðum frítíðarvirksemi hjá ungum sum eldri. Minnilutin minnir á, at umboðini fyri meginfelagið av ungdómsfeløgum ynsktu, at aldursmark uppeftir eins væl og niðureftir varð tikið burtur úr lógini, men kann hetta sum kunnugt

ikki gerast, uttan broytingar verða gjørdar í rammulógini. Av tí at minnilutin heldur tað vera av týdningi, at hesi aldursmark verða tikin burturúr, loyvir minnilutin sær at seta uppskot til samtyktar um at áleggja landsstýrinum at fáa rammulógina broytta samsvarandi hesum sjónarmiðum. Eisini hevur minnilutin broytingaruppskot til upprunauppskot landsstýrisins, ið hava til endamáls at lætta munandi um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum fyri kommunurnar um upprunauppskotið verður samtykt. Út frá hesum loyvir minnilutin, umboð Javnaðarfloksins, sær at mæla løgtinginum til at samtykkja upprunauppskot landsstýrisins frá 19. mars 1981 við hesum broytingum:

1. §20, 3. stk. verður soljóðandi:
   »Til frítíðarvirksemi eftir 4. tátti veitir landskassin kommununum 60% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum. Tó kann studningurin, har serstøk viðurskifti tala fyri tí, verða 70% í ávísum førum.«

2. §23, 2. stk. verður soljóðandi:
   »Av tí veittu upphæddini rindar landskassin 80% og kommunurnar 20%.«
   Restin av 2. stk. verður óbroytt.

3. Í §24 verður í staðin fyri
   »1. august 1982« sett: »1. august 1983«.

Herumframt setir minnilutin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at taka upp samráðingar við ríkisstýrið um »Lov for Færøerne om fritidsundervisning m.v.« fra 14. februar 1979 um at fáa tikið burtur úr lógini øll aldursmark.

Ein annar minniluti (Finnbogi Isaksen) heldur ikki, at mannagongdin undir nevndarviðgerðini hevur verið rætt. Týðandi — og í mongum førum neyðugar — broytingar eru gjørdar, men minnilutin hevði hildið tað verið rættari, um løgtingið sendi føroysku skúlafyrisitingini málið til nýggja viðgerð, heldur enn at lata skrivstovustjóran á ríkisumboðnum saman við einum fulltrúa í landsstýrinum gera broytingarnar. Skúlafyrisitingin umsitur eisini kvøld- og frítíðarskúlar og hevur serkønt fólk á hesum øki.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið sendir málið um landsstýrið til skúlafyrisitingina til nýggja viðgerð.

*Sí skjal 19 b-d*

2. Viðgerð 18. mai. Uppskotið frá meirilutanum í skúlanevndini § 1 samtykt við 26-0, §§ 2-21 samtyktar við 22-0, § 22 samtykt við 20-0, at fara til 3. viðgerð samtykt við 21-0. Uppskot til samtyktar frá Finnboga Isaksen fall við 8-0 og frá Jóannes Dalsgaard fall við 7-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 20-0.

F.L.j.nr. 2116-8 Lóg nr. 70 frá 30. juni 1983

# 129. Uppskot til løgtingslóg um landskassaveðhald fyri láni til P/f Skála Skipasmiðju

Ár 1983, mikudagin 17. mai legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið — loyvi til framløguna varð givið við 30-0 atkvøðum — fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um landskassaveðhald fyri láni til P/F Skála Skipasmiðju.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað við góðkenning figgjarnevndarinnar landskassans vegna saman við hinum partaeigarunum í P/F Skála Skipasmiðju at veðhalda fyri láni upp til falt 15 mó. kr. til P/F Skála Skipasmiðju.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

**lagtingslov om landskassegaranti for lån til P/F Skála Skipasmiðja.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til efter finansudvalgets godkendelse på landskassens vegne sammen med de andre aktionærer i P/F Skála Skipasmiðja at garantere for lån op til ialt kr. 15 mio. til P/F Skála Skipasmiðja.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
P/F Skála Skipasmiðja varð seinast endurfíggjað í mars 1980. Hetta hendir í sambandi við endaligu fíggingina av turrdokkini. Samlaði partapeningurin er kr. 4.445.000,-

Rakstrarúrslitini hjá partafelagnum hava síðani tá verið ójøvn.

Í ávísum førum hevur tað verið neyðugt fyri landskassan sum borgsmaður at leggja út pening fyri skipasmiðjuna.

Skipasmiðjan hevur nú útvegað sær tríggjar byggisáttmálar, 2 trolskip og eitt frysti-farmaskip.

Tað má ásannast, at sáttmálarnir um trolararnar eru dýrari enn teir norsku sáttmálarnir, ið kunnu útvegast fyri líknandi skip.

Landsstýrið undirstrikar, at neyðugt er við framhaldandi skipabygging í Føroyum.

Rakstrarrokniskapurin fyri P/F Skála Skipasmiðju fyri ár 1982 vísir eitt munandi hall. Tí er likviditeturin hjá felagnum tyngdur av hesum.

Landsstýrið hevur havt samráðingar við leiðsluna fyri skipasmiðjuna.

Í tilknýti til viðgerðina av fíggjarligu trupulleikunum hevur landsstýrið undirstrikað fyri leiðsluni á skipasmiðjuni, at tað er neyðugt, at leiðslan fyriskipar rationaliseringS- og effektiviseringstiltøk á skipasmiðjuni.

Leiðslan fyri skipasmiðjuna hevur upplýst m.a.:

Settur er serligur fíggjarleiðari, og hevur hetta víst seg at vera ein munandi bati í fíggjarstýringini, og verður henda óivað enn betri, tá ið EDV er sett í verk á hesum øki.

Á konstruktiónsøkinum, fyri at lætta um arbeiðið har, verður sett á stovn serlig innkeypsdeild.

Krøvini á hesum øki eru munandi vaksin vegna størri skipasløg og tí stóra aktiviteti, ið fer fram í turrdokkini.

Her er ætlan at broyta/vaksa um stabin, soleiðis at hann nøktar tørvin við tilrættalegging og stýring av so væl nýbygningum sum umvælingum.

Eisini á hesum øki verður ásannað, at krøvini eru munandi vaksin, og er her settur ein nýggjur leiðari aftrat.

Áðrenn veðhaldið verður veitt, ætlar landsstýrið at seta fram ítøkiligari krøv um rationaliseringstiltøk og aðrar broytingar.

Ætlanin er, at P/F Skála Skipasmiðja verður debitor fyri lánið, sum landskassin veðheldur fyri. Ein fortreyt fyri hetta veðhald er, at ein regressavtala verður gjørd millum landsstýrið og hinar partaeigararnar, sum ábyrgjast í mun til teirra eginpart í P/F Skála

Skipasmiðju.

Partapeningurin er býttur soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Skála Handverkarafelag | kr. | 1.500.000 (33,75%) |
| Skála Arbeiðsmannafelag | — | 1.300.000 (29,25%) |
| Skála Starvsmannafelag | — | 400.000 (9%) |
| Kommunurnar í sunnara parti av Eysturoy | — | 745.000 (16,75%) |
| Føroya Landsstýri | — | 500.000 (11,25%) |

1. viðgerð 18. mai. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 17. mai 1983 og undir 1. viðgerð 18. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Meðan viðgerðin í fíggjarnevndini fór fram, bað nevndin fyri Skála Handverkarafelag um fund við fíggjarnevndina, og á hesum fundi hevði nevndin fyri Skála Handverkarafelag viðmerkingar til uppskot landsstýrisins. Nevndin fyri Skála Handverkarafelag mælti til, at partapeningurin heldur verður hækkaður, enn at eigararnir av P/f Skála Skipasmiðju saman við landsstýrinum skulu veðhalda fyri uppskotnu lánupphæddini upp á 15 mió. kr.

Seinri hevur fíggjarnevndin havt fund við dagligu leiðsluna fyri Skipasmiðjuna og við nevndarformannin fyri P/f Skála Skipasmiðju. Á hesum fundi vóru bert viðgjørdir tekniskir og fíggjarligir spurningar í sambandi við støðuna hjá skipasmiðjuni.

Undir tí framhaldandi nevndarviðgerðini vórðu sett uppskot fram um aðrar møguleikar enn tann av landsstýrinum uppskotna, at partapeningurin verður hækkaður, eigararnir av P/f Skála Skipasmiðju saman veðhalda fyri einum parti av láninum og landskassin einsamallur fyri restini, og at landskassin, eftir at eigararnir saman veðhalda fyri einum parti, men uttan at partapeningurin verður hækkaður, einsamallur veðheldur fyri restini av lánupphæddini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi spurningarnar á fundi tann 27. mai 1983, og varð tá avgjørt at heita á landsstýrið um at taka støðu til tey uppskot, ið nú lógu fyri sum broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

Á fundi tann 27. mai 1983 samtykti landsstýrið at halda seg til upprunaliga uppskot sítt í málinum.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 30. mai 1983 aftur viðgjørt

málið og hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Asbjørn Joensen, Atli P. Dam og Juul Jacobsen) mælir til at broyta § 1 soleiðis, at partapeningurin verður hækkaður við 10% av 15 mió. kr., at allir partaeigararnir í P/f Skála Skipasmiðju veðhalda fyri 15% av lánupphæddini upp á 15 mió. kr., og at landskassin einsamallur veðheldur fyri restini ella fyri 75% av 15 mió. kr.

Sostatt setir nevndi minniluti fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

§ 1 verður orðað soleiðis:

»Treytað av, at av partaeigarunum verða nýteknaðar kr. 1.500.000 í nýggjum partapeningi í P/f Skála Skipasmiðju, verður landsstýrinum heimilað við góðkenning fíggjarnevndarinnar landskassans vegna saman við hinum partaeigarunum í P/f Skála Skipasmiðju at veðhalda fyri láni upp á kr. 2.250.000 til P/f Skála Skipasmiðju og landsstýrinum einsamalt við góðkenning fíggjarnevndarinnar landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp á kr. 11.250.000 til P/f Skála Skipasmiðju.«

§ 1 formuleres således:

»Betinget af, at der af aktionærerne nytegnes kr. 1.500.000 i aktier i P/f Skála Skipasmiðja, bemyndiges landsstyret til efter finansudvalgets godkendelse på landskassens vegne sammen med de andre aktionærer i P/f Skála Skipasmiðja at garantere for lån på kr. 2.250.000 til P/f Skála Skipasmiðja og landsstyret alene efter finansudvalgets godkendelse på landskassens vegne at garantere for lån på kr. 11.250.000 til P/f Skála Skipasmiðja.«

Minnilutin (Ove Mikkelsen) metir, at tað er ivasamt, um ein lántøka hjá P/f Skála Skipasmiðju kann fáa gagnligar, fíggjarligar avleiðingar fyri virkið, tá eingin vissa er útvegað fyri meiri lønandi rakstri framyvir, og setir sami minniluti tí fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður heimilað at ogna sær partapeningin í P/f Skála Skipasmiðju og at bjóða virkið út til sølu.

2. viðgerð 31. mai. Atkvøðugreiðsla 1. juni. Minnilutauppskotið frá nevndini §1 samtykt við 19-0, §2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð samtykt við 24-0. Uppskotið frá Ove Mikkelsen varð afturtikið.

1. juni løgdu Juul Jacobsen, Atli Dam og Asbjørn Joensen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Sum §1, stk. 2 verður sett: landsstýrinum verður heimilað við góðkenning fíggjarnevndarinnar landskassans vegna at hækka partapening sín í P/F Skála Skipasmiðju við 20% av kr. 1.500.000 ella kr. 300.000.

Som §1, stk. 2 indsættes: Landsstyret bemyndiges til med finansudvalgets godkendelse på landskassens vegne at forhøje sin del af aktiekapitalen i P/F Skála Skipasmiðja med 20% af kr. 1.500.000 eller kr. 300.000.

Loyvi til frávik í tíðarfreistini varð givið til 3. viðgerð, sum fór fram á seinni fundi sama dag. Atkvøðugreiðsla 1. juni. Uppskotið varð sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0.

F.L.j.nr. Lóg nr. 71 frá 4. juli 1983

# 100-1 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, um tilboð fyri evnaveik

Ár 1982, týsdagin 7. september var omanfyri nevndi fyrispurningur frá Jóannes Dalsgaard, løgtingsmanni, fráboðaður, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**
**til**
**Eilif Samuelsen, landsstýrismann**

Nær verður útbyggingin av smærri vistar-, upplæringar- og umlættingarheimum fyri evnaveik úti um landið sett í verk soleiðis sum samtykt av løgtinginum í 1976?

**Viðmerkingar:**
Í 1976 samtykti Føroya Løgting, at víðari útbygging fyri evnaveik skuldi fara fram sum smærri vistar-, upplæringar- og umlættingarheim úti um landið. Í sama viðfangi samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at skipa fyri hesari útbygging og at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar fyri at fáa hesa útbygging framda (Tingmál nr. 72/1975).

Síðan henda samtykt varð gjørd, er tørvurin á tilboðum um arbeiði, bústað, upplæring og umlætting til evnaveik vaksin, serstakliga á plássum uttan fyri Tórshavn. Hetta kemur av, at nærum øll útbygging av umsorganini fyri evnaveikum hevur verið í Havn, men eisini her eru øll tilboð troytt út í æsur.

Tað er tí álvarsamur vandi fyri, at vit enda aftur í tí gomlu støðuni, har vit kanska verða noydd til at senda okkara evnaveiku av landinum — nakað, sum hvørki tey evnaveiku ella teirra avvarðandi kunnu góðtaka.

Tað er tí av stórum týdningi fyri allar partar at fáa at vita, nær tann útbygging av tilboðum til evnaveik, sum løgtingið hevur samtykt, verður sett í verk, og loyvi eg mær tí at seta landsstýrismanninum í almannamálum henda fyrispurning.

9. september var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

3. december 1982 svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismanður, fyrispurninginum soleiðis;

**Svar**

Spurningurin var soljóðandi:

»Nær verður útbyggingin av smærri vistar-, upplæringar- og umlættingarheimum fyri evnaveik úti um landið sett í verk soleiðis sum samtykt av løgtinginum í 1976?«

Í sambandi við viðgerðina av løgtingsmáli nr. 72/1975: Nýggj sjúkrahúslóg varð sett fram eitt uppskot til samtyktar um, at ætlaða byggingin av teimum báðum sjúklinga bygningunum fyri evnaveik á statssjúkrahúsinum skuldi fremjast samsvarandi teimum byggiætlanum, ið sosialstýrið hevði gjørt uppskot til.

Álagt varð landsstýrinum at skipa fyri, at byggingin varð byrjað beinanvegin.

Henda umtalaða bygging er tað, vit í dag kenna sum Eirargarður 14-16, og sum varð tikin í brúk í 1980.

Løgtingið álegði haraftrat landsstýrinum at skipa fyri, at víðari útbygging fyri evnaveik — umframt frammanfyri nevndu bygging av 2 sjúklingabygningum fyri evnaveik á statssjúkrahúsinum — verður framd sum smærri vistar-, uppvenjingar- og avlastingarheim runt um í landinum, og beinanvegin at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar, fyri at henda útbygging kundi verða framd skjótast gjørligt.

Mær vitandi hava ongar beinleiðis samráðingar hesum viðvíkjandi verið tiknar upp við ríkismyndugleikarnar, hvørki av undanfarna ella av núsitandi landsstýri. Tó er at siga, at landsstýrið í oktober 1978 setti eina nevnd, sum skuldi kanna tørvin á útbygging av forsorgini fyri andveik í Føroyum og geva landsstýrinum tilmæli í so máta.

Nevndin fekk ikki ásett nakran neyvari arbeiðssetning ella nakra

ávísa tíðarfreist.

Í hesari vikuni hevur nevndin handað landsstýrinum álit. Nevndin skjýtur upp, at bygdir verða (ella um hóskandi hús eru tøk til keyps ella sum longu eru ogn hjá tí almenna) samansettir stovnar, sum rúma bústaðarmøguleikum, umlættingarmøguleikum og uppvenjingarmøguleikum. Til hesar stovnar skulu verða knýtt verkstøð, ið bæði kunnu rúma heimabúgvandi og teimum, sum búgva á stovnum.

Nevndin metir, at slíkir stovnar eiga at setast í Norðuroyggjum, við Streymin og í Suðuroy.

Nevndin metir líkaleiðis, at Eirargarður 14-16 ikki er væl hóskandi heim fyri andveik, men átti at verið avloyst av smærri heimum, spjadd runt um í býnum.

Tankar eru annars frammi um, at t.d. helvtin av Eirargarði hevði verið væl hóskandi at brúkt sum Røktarheim fyri einum 24 fólkum.

Landsstýrið fer nú at arbeiða víðari við ætlanunum um útbygging av heimum fyri andveik í ljósinum av teimum hugsanum, ið fram eru førdar av nevnda áliti. Somuleiðis fer landsstýrið at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar til tess at fáa framt útbyggingina, so skjótt sum til ber.

F.L.j.nr. 900-7-1

# 100-2 Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann, viðvíkjandi nýggjum millumbylgjusendara

Ár 1982, hósdagin 9. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið nakrar veruligar ætlanir um at seta ein nýggjan og sterkari millumbylgjusendara upp á Skúvanesi.
   Um játtandi svar,
2. Nær kann hendan ætlan so væntast framd.

**Viðmerkingar:**

Tað hevur nú í áravís verið øllum kunnugt, ið hvussu vánaligum standi tann útslitni verandi millumbylgjusendarin er í. Eins væl átti tað at verið øllum kunnugt,hvussu stutt bæði FM- og millumbylgjusendararnir røkka frá landi. Ein skal ikki longur til sjós enn innarlaga á Munkagrunninum ella á Mykines grunninum, tá Útvarp Føroya yvirhøvur ikki hoyrist.

Slíka vánaliga útvarpstænastu kunnu vit ikki framhaldandi ár eftir ár bjóða okkara sjófólki. Skipini gjalda eisini útvarpsgjald, og skuldi hetta verið ein sjálvsagdur rættur, at okkara sjómonnum — ið hvussu er, tá teir fiska á Føroyagrunninum — gevast høvi til at hoyra Útvarp Føroya.

So statt loyvi eg mær við formansins loyvi at seta landsstýrismanninum Tórbjørn Poulsen, sum hevur hetta mál um hendi, fylgjandi spurningar.

Á FØROYA LØGTINGI, 8. september 1982.
Ove Mikkelsen

Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

17. september svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Við ársenda 1977 varð loranstøðin í Vági niðurløgd. Tingingar við eigaran, Farvandsdirektoratet, førdu til, at landsstýrið var sinnað at yvirtaka ognirnar, sum hoyra til støðina, og við løgtingslóg frá 12. mai 1980 hevur landsstýrið útvegað sær heimild til landskassans vegna at læna kr. 1.256.000 til nevnda endamál.

Spurningurin, um tann parturin av støðini, sum liggur á Skúvanesi, er nýtiligur til eitthvørt teletekniskt endamál, t.d. at býsa einum millumbylgjusendara til Útvarp Føroya, liggur nær. Húsini eru í góðum standi, vegur og háspenningslinja er til dyrnar, og umfatandi jørðnet er til eina møguliga antennumastur. Alt hetta hevur virði av fleiri milj.kr. — um so er, at støðin er nýtilig eitt nú til millumbylgjusendistøð.

Sum kunnugt liggur støðin uppi á einum 200 m høgum forbergi, og millumbylgjusendistøðir verða í dag vanliga ikki bygdar í tílíkum umhvørvi. Samanber t.d. sendistøðirnar, sum norska útvarpið hevur bygt og hevur ætlan um at byggja. Tær liggja í skergarðinum dygst í sjóvarmálan, og verður hetta mett at geva best útbreiðsluúrslit.

Til tess at kanna, um Skúvanes var egnað til sendistøð hjá útvarpinum, samtykti landsstýrið í vár, at farast skuldi undir mátingar av útbreiðsluviðurskiftunum frá Skúvanesi. Hesar mátingar, sum telefonverkið saman við post- og telegrafverkinum hava staðið fyri, eru júst lidnar. Úrslitið fyriliggur ikki enn, men fyribils kann sigast so mikið, at útbreiðslan er góð í vestan og sunnan, minni góð í eystan og vánaligast í norðan. Endaliga úrslitið av kanningini kemur at fyriliggja seinni í ár, og kann støða tá verða tikin til málið.

Uttan mun til, um gamla loranstøðin á Skúvanesi er nýtilig sum sendistøð hjá útvarpinum ella ikki, verður neyðugt at fara undir eina endurnýggjan av sendistøðum útvarpsins, tað veri seg millumbylgjusendaranum, sum er eins gamal og útvarpið, og onkrar av teim eldru FM-sendarunum frá fyrst í sjeytiárunum. Landsstýrið er sinnað at virka fyri, at farið verður undir hesa endurnýggjan og útbyggjan av sendineti útvarpsins.

Nær ætlanin um at seta millumbylgjusendara upp á Skúvanesi

kann fremjast, ber illa til at siga við vissu. Tað veldst um úrslitið av áðurnevndu kanningum og um játtan tingsins.

F.L.j.nr. 1902-53

---

Løgtingstíðindi 1902 A - 93

# 100-3. Fyrispurningur til løgmann viðvíkjandi helikoptaraflúgving

Ár 1982, mánadagin 13. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið nakra ætlan um at seta í verk helikoptaraflúgving til útoyggjarnar og tær bygdir, sum enn ikki hava nakað vegasamband?
2. Um svarið er játtandi, nær ætlar landsstýrið so at byrja flúgvingina?
3. Undir hvørjum formi kemur ein slík flogferðsla at verða skipað?
4. Um flúgvingin verður almenn, undir hvørjum almennum stovni skal hon so verða?

**Viðmerkingar:**

Tá meirilutin í figgjarnevndini ikki var fyri at játta landsstýrinum fígging av framhaldandi royndarflúgving við »Tyrlu«, var grundgevingin henda:

1. At alment váttaði samgongan/landsstýrið, at »Tyrla« skuldi avloysa øll tey smærru strandferðaskipini til útoyggjarnar. Tey skuldu øll seljast skjótast gjørligt eins og læknabátar, og ongin vegur ella berghol skuldu nakrantíð gerast til tess bygdir sum framvegis eru uttan vegasamband. »Tyrla« skuldi klára allan flutningin bæði av ferðafólki og góðsi.

   Eftir vitjan við »Tyrlu« á flestu av tilskilaðu plássunum, varð meirilutin av figgjarnevndini tó sannførdur um, at »Tyrla« ongantíð kom at megna hesa uppgávu einsamøll.
2. At tann formur, »Tyrla« varð og varð ætlað at verða rikin uppá, var figgjarliga og samfelagsliga óforsvarligur, nevniliga, at hvørt oyra, flogfarið fleyg inn, pluss stórt alment tilskot skuldi alt fara av landinum. Umleið eina til hálvaaðru millión um mánaðin.

3. Og ikki minst, at henda patentloysnin fyri útoyggar og útjaðararnar skuldi verða tann endaliga loysnin fyri allar tíðir framyvir.

Øll fíggjarnevndin var tó samd um — ja, á einum máli um — at ein helikoptaraservice til útoyggjarnar verður neyðug.

Eins og tað er lívsneyðugt, um ætlanin er, at fólk skal búgva har, at oyggjunum verður tryggjað regluligt samband bæði viðvíkjandi ferða- og farmaflutningi, eisini og ikki minst, tá tað ikki er fermandi sjóvegis, eins og tær bygdir, sum ikki hava vegasamband, hava ikki bert tørv, men samfelagslig krøv upp á somu almennu tænastu. Eisini verður altíð tørvur fyri neyðsynjar hjálp loftvegis fyri eitt oyggjaland sum Føroyar, t.d. til sjúkraflutning, til lækna ella sjúkrahúsviðgerð.

Samstundis setti minnilutin í fíggjarnevndini fram uppskot um eina loysn av nevndu helikoptaratænastu. Bæði uppskot um eina fyribils loysn og eina endaliga loysn.

Men síðan — nærum eitt ár aftan á — hava landsstýrið og samgongan púrt einki gjørt við málið — bert óálítandi leyst og ikki eftirfarandi tos. Lítt eyðkenni fyri hesa samgongu og hetta landsstýri.

Nevndu pláss hava fyri neyðini nevndu samfelagstørvir:

Regluliga tilflyting av neyðsynjarvørum eins og møguleika fyri regluliga at sleppa av við teirra framleiðslu, eina mest seint á heysti og tíðliga á vári, tá ókyrra hevur ræði.

Nú er vetur aftur í hond, og enn er einki útspæl komið frá samgonguni/landsstýrinum um hesa almennu samfelagsskyldu.

So statt loyvi eg mær við formansins loyvi at seta fram fylgjandi fyrispurning til Paula Ellefsen, løgmann, sum enn hóast alt má metast at vera høvdið á sitandi samgongu, um slíkt nakrantíð hevur funnist, tá tað er sera ringt at skilja, hvat samgongan veruliga vil ella ikki vil.

Við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

2. mars 1983 svaraði løgmaður fyrispurninginum solciðis:

**Svar**

Fyrispurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið nakra ætlan um at seta í verk helikoptaraflúgving til útoyggjarnar og tær bygdir, sum enn ikki hava nakað

vegasamband?
2. Um svarið er játtandi, nær ætlar landsstýrið so at byrja flúgvingina?
3. Undir hvørjum formi kemur ein slík flogferðsla at verða skipað?
4. Um flúgvingin verður almenn, undir hvørjum almennum stovni skal hon so verða?

*Viðvíkjandi 1. spurningi:*
Landsstýrið hevur lagt uppskot fyri løgtingið — javnber løgtingsmál nr. 68/1982 — og biðið um loyvi til at keypa ein helikoptara, væl minni enn Tyrla, til hesa nýtslu.

*Viðvíkjandi 2. spurningi:*
Skjótast gjørligt aftan á at løgtingið hevur samtykt tað undir 1. spurningi løgtingsmál.

*Viðvíkjandi 3. spurningi:*
Hesin spurningur er ikki avgreiddur enn. Landsstýrið hevur samráðingar við loftferðslumyndugleikarnar v.fl., og verður avgerð tikin sum skjótast.

*Viðvíkjandi 4. spurningi:*
Flúgvingin verður fyribils rikin í Strandfaraskipum landsins. Ætlanin er at seta neyðuga mannin, pilotar og teknikarar á eina serliga deild á hesum stovni.

F.L.j.nr.

# 100-4. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann, viðvíkjandi forboð fyri veiðu eftir smáfiski á landleiðini

Ár 1982, mánadagin 13. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hevur landsstýrið nakrar ávísar ætlanir um at seta forboð fyri veiðu eftir smáfiski á landleiðini.
2. Um so er, nær kann væntast, at slíkt forboð fyri veiðu eftir smáfiski verður sett í gildi.

**Viðmerkingar:**

Sum teim flestu her á landi, heruppi í eisini fiskimálaráðharranum, er kunnugt, fer framvegis ein stór veiða fram á okkara nærru grunnum eftir smáfiski. Her er talan um nærum øll sløg av botnfiski, so sum av upsa, hýsu og toski.

Stórar nøgdir av stórseiði, hýsuhvølpum og toskamurtum verða framvegis veiddar og avreiddar til flakavirkini, sum ofta koma upp í rasshaft av størri nøgdum av smáfiski. Alt liggur júst um málið — longd — sumt júst yvir og annað júst undir mál. Men av tí, at talið av nøgdini er so øgiliga stórt, er tað jú ógjørligt, at nøkur verulig skiljing av longd veruliga kann fara fram. Dygdin er aloftast undir allan kritikk, fiskurin bæði bleytur og kroystur. Hjá virkjunum er ógvuliga tungt at fáa undan,

so beinleiðis vinningur er eingin, heldur hin vegin. Men hvat so? Jú, tað almenna letur jú studning til slíkan fisk, bæði til virki, skip og manning.

Smáfiskur er nú einaferð so vorðin, at hann fyri tað mesta heldur seg saman í stórum torvum og heldur til á ávísum økjum. Tí áttu avvarðandi myndugleikar í álvara at gjørt sær greitt, hvat tað er fyri ein óhugnalig ránsveiði og oyðing, sum fer fram í stóran stíl av nevndu stovnum við at drepa stóran part av smáfiskinum — einans fyri ein stokkutan løtuvinning.

Tí fari eg at loyva mær við formansins loyvi at seta fiskinálaráðharranum hesar spurningar.

Við 28-0 atkvøðum varð samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

15. november svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum solciðis:

**Svar**
uppá

fyrispurning frá Ova Mikelsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi forboð fyri veiðu eftir smáfiski á landleiðini.

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, hevur sett mær tveir spurningar.

Tann fyrri er: Hevur landsstýrið nakrar ávísar ætlanir um at seta forboð fyri veiðu eftir smáfiski á landleiðini.

Og tann seinni er: Um so er, nær kann væntast, at slíkt forboð fyri veiðu eftir smáfiski verður sett í gildi.

Til fyrra spurning er svarið ja. Løgtingið hevur í ár (6. mai) eftir uppskoti frá landsstýrinum samtykt eina lóg um serstøk tiltøk til vernd av ungfiski á landleiðini.

Til seinna spurningin kann sigast, at uppskot til reglugerð fyri hetta verjutiltak er gjørt, og landsstýrið kemur helst at hava fund við Fiskivinnunevndina í hesi vikuni til tess at samtykkja reglugerðina.

Tá ið reglugerðin er samtykt, verður hon kunngjørd og sett í gildi beinanvegin.

F.L.j.nr. 1501-2-3

# 100-5. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann. Viðvíkjandi trygdarkanningum av ferðafólki.

Ár 1982, mánadagin 13. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ove Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at kanningartólini til kanningar av fráfarandi ferðafólki, sum longu hava staðið klár á flogvøllinum, ikki enn eru tikin í nýtslu?
2. Hvør skal standa fyri hesum kanningum, og undir hvørjum stovni skulu hesar vera og hví?
3. Er orsøkin til, at tólini ikki hava verið nýtt, tann, at lógarheimild tørvar fyri, at føroyingar hava loyvi at gera slíkar trygdarkanningar?

**Viðmerkingar:**

Sum eg áður havi greitt tinginum frá, so hevur flogvøllurin í Vágum ein svartan ring kring seg á alheims flogkortum, sum merkir, at har eru eingi trygdartiltøk ella kanningar av nøkrum slag, sum kunnu fyribyrgja, at møguligt vápnað ovirgangsfólk sleppa umborð á fráfarandi flogfør við sínum vápnum.

So statt hava alheims organiserandi flogfarsmanningar loyvi og rætt til at sýta fyri at flúgva upp á Føroyar, so leingi slík kanningartiltøk ikki eru í lagi.

Kanska onkur vil meina, at slíkt hendir jú ikki í Føroyum. Vónandi ikki. Men tað átti at verið øllum greitt, at um flogvøllin í Vágum ferðast nú fólk frá øllum tjóðum bæði upp og niður.

Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

15. november svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**
uppá
fyrispurning frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi trygdarkanning av ferðafólki.

»1. Hvør er orsøkin til, at kanningartólini til kanningar av fráfarandi ferðafólki, sum longu hava staðið klár á flogvøllinum, ikki enn eru tikin í nýtslu?«

*Svar:* Tólini eru tikin í nýtslu. Orsøkin til, at trygdarkanningin ikki byrjaði fyrr enn 20. oktober, var, at tólini ikki vóru í lagi fyrr enn tá.

»2. Hvør skal standa fyri hesum kanningum, og undir hvørjum stovni skulu hesar vera og hví?«

*Svar:* Tollvaldið skal fyribils standa fyri hesum kanningum, tí tollvaldið hevur heimild til at kanna ferðafólk, viðføri teirra v.m.

»3. Er orsøkin til, at tólini ikki hava verið nýtt, tann, at lógarheimild tørvar fyri, at føroyingar hava loyvi at gera slíkar trygdarkanningar?«

*Svar:* Aðrastaðir er tað soleiðis, at arbeiðsfólkið á einum flogvølli hevur heimild at gera slíkar kanningar sambært luftfartslógum.

Í Føroynm er danska lógin hesum viðvíkjandi ikki sett í gildi enn. So statt hevur fólkið á flogvøllinum ikki loyvi at gera slíkar kanningar.

Tí verður heimild tollverksins nýtt fyribils.

F.L.j.nr. 1820-26-1

# 100-6. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann. Viðvíkjandi lýsing av alheims trygdarlógum viðvíkjandi flogførum og flogferðslu

Ár 1982, mánadagin 13. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær verða alheims trygdarlógir viðvíkjandi flogførum, teirra manning og flogferðslu v.m. lýstar at galda í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Her havi eg eisini áður gjørt tinginum vart við, at hesar lógir um sýning, kanning av flogførum og teim ymsu certifikatunum, flogfør og manningar teirra skulu hava, endurnýggjað upp til dato v.m., tí so leingi hesar lógir ikki eru settar í gildi í Føroyum, hevur ein og hvør privat ella almenn trygging av ferðafólki úr Føroyum einki gildi í Føroyum.

Líkamikið til hvørja upphædd, ein tryggjar seg fyri og rindar, so fær hvørki viðkomandi ella avvarðandi meir enn ávísa upphædd, umleið 20.000 kr., um vanlukka skuldi borist á, hvat vónandi ikki hendir.

Sostatt verður goldið fyri nakað, sum eingin heimild er at fáa nakað fyri.

Øll vita, at líknandi lógir eru galdandi í Føroyum, tá talan er um akfør ella skip, at tey skulu lúka ávís trygdarkrøv, eins og ávís skjøl skulu vera í lagi. Til at ansa eftir, at slík eru í lagi, hava vit bileftirlitið og skipasýnið.

At halda fram á hendan hátt er ábyrgdarleyst av avvarðandi myndugleikum, bæði teim fyrr- og núverandi, og harumframt meti eg, at tað er skeivt at lata fólk gjalda fyri eina tryggingarupphædd, sum ongan veruleika hevur aftan fyri seg.

Tí fari eg eina ferð enn at heita á Páll Vang, landsstýrismann, sum nú umsitur hesi mál, at syrgja fyri, at tær neyðugu loftferðslulógir hesum máli viðvíkjandi verða lýstar at galda í Føroyum, og vil eg tí við formansins loyvi loyva mær at seta fram hendan spurning.

Við 26-0 atkvøðum varð samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

15. november svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**
uppá

fyrispurning frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi lýsing av alheims trygdarlógum viðv. flogførum og flogferðslu í Føroyum.

»Nær verða alheims trygdarlógir viðvíkjandi flogførum, teirra mannin og flogferðslu v.m. lýstar at galda í Føroyum?«

*Svar:* Landsstýrið hevur saman við lógarnevnd løgtingsins arbeitt við teimum ríkislógum innan loftferðslu, sum ikki eru settar í verk í Føroyum.

Landsstýrið og lógarnevndin eru fyribils liðug við sítt arbeiði, og tær broytingar, ið heimastýrið ynskir í lógunum, eru handaðar »Ministeriet for offentlige Arbejder« á fundi í Keypmannahavn 28. september 1982.

Bíðað verður nú eftir svari frá donsku myndugleikunum. Tá svarið er komið, og um landsstýrið er nøgt við tað — t.v.s. um okkara ynski verða gingin á møti — verður uppskot lagt fyri løgtingið hesum viðvíkjandi.

*Íkoyti til spurningin:*

Viðvíkjandi »alheims trygdarlógir« meinast óivað við teir millumlanda sáttmálar, ið Danmark hevur undirritað á hesum øki.

Tað ber ikki føroyingum til at seta hesar millumlanda sáttmálar í verk her á landi, tí teir eru »innbygdir« í donsku loftferðslulógirnar.

F.L.j.nr. 1820-9-1

# 100-7. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. landsstýrisins støðutøku til klagu frá prógdómara um skipsføraranæmingar

Ár 1982, mánadagin 13. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Í summar vórðu 3 næmingar til skipsføraraprógv á Føroya Sjómansskúla av lærara og prógdómara ákærdir fyri prógtøkusvik í skrivligum enskum og fingu sostatt einki prógv. Tað skilst, at prógdómarin kravdi, at øll royndin hjá teimum trimum skuldi takast um aftur í øllum greinum, meðan landsskúlafyrisitingin, sum hevur havt málið til viðgerðar, samtykti, at einans skrivlig roynd í enskum skuldi takast um aftur, og mælti nevndin landsstýrinum til at taka somu avgerð.

1. Varð hendan avgerð hjá Landsskúlafyrisitingini fylgd av landsstýrinum, ella er avgerð tikin í málinum av einans tí manni, sum hevur skúlamál um hendi?
2. Hvør var so avgerð landsstýrisins?
3. Um avgerðin frá Landsskúlafyrisitingini ikki varð fylgd, ella avgerð landsstýrismansins var hon, at næmingarnir skulu taka allar royndirnar um aftur í øllum greinum, so loyvi eg mær at spyrja: Við hvørjari grundgeving og við hvørjari heimild hevur landsstýrismaðurin tikið slíka avgerð?

4. Er landsstýrismaðurin greiður yvir, at støða um umroynd skapar præsedens fyri, at einhvør roynd til prógvtøku her á landi so kann krevjast um aftur tikin langa tíð aftan á, at royndin sjálv er lokin, bert hetta verður avgjørt, áðrenn prógvtøkuskjalið verður handað næminginum?
5. Er fullgott prógv fyri, at svik er farið fram?

Vóru ikki eftiransarar í royndarhøllini alla tíðina, meðan royndin fór fram, og gjørdu hesir eftiransarar vart við, at svik varð farið fram. Um so er, nær?

6. Stendur ikki í danskari prógvtøkulóg: »Når eleven har forladt eksamenslokalet, er hans prøve overstået«?

Er eingin tilsvarandi lóg galdandi fyri Føroyar?

**Viðmerkingar:**

Í summar vóru 3 næmingar til skipsføraraprógv burturvístir frá Føroya Sjómansskúla av prógvdómara, tá hesin metti, at teir høvdu svikað í skrivligum enskum, og útbasuneraði Føroya Útvarp hesi tíðindi, og hevur tað eisini síðani lýst málið fleiri ferðir. Hesi ódámligu tíðindi, sum eftir mínum meti hvørki áttu at verið blást so stórt upp og enn minni útvarpað, hava bæði mín og almenningsins áhuga at fingið at vita, hvat veruliga hendi viðari í málinum.

Eg veit, at málið hevur verið viðgjørt í Landsskúlafyrisitingini, og at nevndin samtykti, at næmingarnir einans skuldu taka hesa einu roynd um aftur, nevniliga í skrivligum enskum, og at nevndin mælti landsstýrinum til at taka somu støðu.

Men tað er tíverri øllum púra ógreitt, hvør niðurstøðan varð í landsstýrinum, og tí loyvi eg mær at seta nakrar spurningar til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, sum hevur slík mál um hendi, við formansins loyvi.

Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

15. november svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**
til
*Ova Mikkelsen, løgtingsmann*

24. mai 1982 var prógvtøka í skrivligum enskum fyri skipsførarar á Føroya Sjómansskúla. Undir rættingini av uppgávunum kemur prógvdómarin til úrslitið, at 3 av næmingunum hava svikað undir

prótøkuhaldinum í loysnini av uppgávuni. Prógdómarin tekur ta avgerð at vísa burtur næmingunum frá skipsføraraprótøkuni summarið 1982.

Avgerðin verður av prótakarunum kærað til landsskúlafyrisitingina, ið kemur til ta niðurstøðu ikki at broyta avgerðina.

Henda avgerðin verður síðani kærd til landsskúlaráðið, ið samtykkir, at prótakararnir »sum eina semjuloysn taka hesa ávísu lærugrein umaftur«.

Prógdómarin kærir nú til landsstýrið, og kemur landsstýrið 8. juli 1982 til ta niðurstøðu at staðfesta avgerð prógdómarans, »at teir 3 prótakararnir eru burturvístir frá skipsføraraprótøkuni 1982«.

Svar:

*ad 1.* Avgerðin hjá landsskúlafyrisitingini og ikki hjá landsskúlaráðnum varð fylgd av landsstýrinum. Landsstýrismaðurin í skúlamálum tók avgerðina einsamallur.

*ad 2.* Greitt er frá avgerðini frammanundan.

*ad 3.* Tað má vera ein fyritreyt fyri eini og hvørjari prótøku, um tað stendur skrivað ella ikki, er líkamikið, at hann, ið er uppi, sjálvur og uttan hjálp frá øðrum luttakarum loysir tær uppgávur, ið eru settar honum. Ger hann tað ikki, so verður karakterurin har eftir, og loysir hann uppgávurnar bert við hjálp frá øðrum, hevur hann brotið fortreytirnar, svikað er.

Hann, ið hjálpir øðrum undir prótøkuni at loysa uppgávurnar, hann eigur at vita, at hann er samsekur í sviki, at hann hjálpir øðrum at bróta fortreytirnar fyri prótøkuni.

Vanligt er við prótøkuhaldi, at hann, ið snýtir, og hann, ið er samsekur, fáa somu straff, at teir verða burturvístir frá prótøkuni. Eg dugi ikki at síggja, at avgerðandi er, um svikarin verður avdúkaður »på fersk gerning« ella á annan hátt. Avgerandi er, at tað verður avdúkað, at svikað er.

*ad 4.* Ja, tá svikað er.

*ad 5.* Landsstýrið hevur grundað sína avgerð á tilfarið í málinum og metti, at svik eftir hesum er farið fram. Eftiransarar vóru í prótøkuhølinum, men fyriliggur einki um, at teir hava borið við svikið.

*ad 6.* Reglan er landsstýrinum ókunnug.

F.L.j.nr. 2109-27-2

# 100-8. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann. Viðv. ferðaætlan fyri Suðuroyarsiglingina

Ár 1982, mánadagin 13. september varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið nakran myndugleika til at ávirka planleggingina av ferðaætlanini fyri »Teistan«, áðrenn hendan verður lýst at galda?
2. Um játtandi svar, hevur landsstýrið so myndugleika til at krevja, at siglt verður úr Suðuroy kl. 7 á morgni í staðin fyri sum nú kl. 9 og kl. 10 flestu dagarnar í vikuni, um landsstýrið er sannført um, at hetta gevur betri service á Suðuroyarrutuni?
3. Hevur landsstýrið myndugleika at bera so í bandi, at »Teistin« skal ferma 2 ferðir um vikuna til Vágs, um landsstýrið metir hetta verða neyðugt?
4. Hevur landsstýrið myndugleika til at áleggja leiðslu strandferðslunnar, at broytingar í ferðaætlanini — eins og broytingar í broytingum — verða væl lýstar?
5. Hevur landsstýrið nakran myndugleika at skera burtur teir túrar í Suðuroyarsiglingini, sum suðuroyingar meta vera óneyðugar, og sum onga service geva suðuroyingum?

**Viðmerkingar:**

Tá tíðin nú er komin, at nýggj ferðaætlan fyri Suðuroya siglingina skal gerast og setast í gildi, at suðuroyingar yvirhøvur onga ávirkan hava á ferðaætlanina, og at galdandi ferðaætlan hevur givið suðuroyingum ta vánaligastu service, sum vit higartil hava kent

á hesum øki, loyvi eg mær at spyrja landsstýrismannin, um landsstýrið — sum so — hevur nakran myndugleika at ávirka planleggingina av ferðaætlanini, soleiðis at hon tænir Suðuroyar álugamálum fyrst og fremst. T.d. hevur »Teistin« siglt av Tvøroyri 4 dagar um vikuna kl. 9 og kl. 10 á morgni, soleiðis at suðuroyingar fyrst eru á Havnarkai ávikavist kl. 11,30 og kl. 12,30 og eru sostatt noyddir at liggja nátt í Havn. Sum nú er, sleppa teir ikki aftur til Suðuroyar fyrrenn kl. 20,30 dagin eftir. Skal ein á flogvøllin, er sama skilið, ein má av oynni á morgni dagin fyri.

Ferðaseðilin um Suðuroyarfjørð aftur og fram kostar í dag 120,- kr., hartil kemur rutan í oynni frá 60 til 200 kr. og vistarhald í Havn fæst neyvan undir 250 kr. Ella við øðrum orðum kostar tað vanliga suðuroyingum eitt dags ørindi í Havn í minsta lagi ávikavist 430 til 580 kr. í beinleiðis ferða- og neyðugum gistingarútreiðslum.

At suðuroyingar eins og aðrir føroyingar noyðast til Havnar við hvørt, er vitiligt, antin í onkrum neyðugum ørindi, til serlækna ella annað. Hendan seina fráferð av Tvøroyri á morgni sigst at vera grundað á umhugsni til mammur við børnum. Hetta er tað reina tvætl, tí mammur við børnum hava allar dagar ferðast um Suðuroyarfjørð og tað undir munandi verri ferðaumstøðum enn í dag. Tær hava eisini høvi at fara úr oynni seinri á degi 3 ferðir um vikuna.

Sum nú er, fermir »Teistin« bert ein dag um vikuna til Vágs, og átti hetta at verið broytt til tveir farmadagar til Vágs um vikuna. Í ferðaætlanini verða lýstar broytingar í Suðuroyar siglingini fyri stevnur og størri halgidagar, men hava flestu av hesum lýstu broytingum verið broyttar til aðra siglingartíð og til aðra havn enn fráboðað og hartil sera vánaliga lýstar. T.d. 10. juli, Vestanstevnuleygardagin, skuldi »Teistin« eftir hesi eykaferðaætlan fara av Havnini kl. 22. Men hvat hendi, báturin sigldi kl. 18 - tveir tímar áðrenn — og var hendan eykabroyting bert lýst einaferð dagin fyri á miðdegi. Úrslitið var, at hópin av ferðafólki, har ímillum nógv fólk, sum var komið við flogfarinum, lá eftir í Havn, tí tey høvdu ikki hoyrt hesa lýsing og vóru tí noydd at útvega sær innivist til dagin eftir. Ferðafólk, sum koma við flogfari, hava ikki hoyrt lýsingarnar í útvarpinum, áðrenn tey eru komin til Føroya.

Eisini hevur ofta verið lýst í útvarpinum á kvøldi, at »Teistin« fer á Tvøroyri í staðin fyri á Vág, men lýst verður bert ein hálvan tíma, áðrenn báturin leggur til kai á Tvøroyri, og ferðafólk, sum eru á Vágs kai ella á veg hagar, mugu standa eftir, tí eingin ruta er til Tvøroyrar og tað av góðum grundum.

Sostatt fari eg at loyva mær at heita á landsstýrið um at syrgja fyri, at hesir broyttu túrar vera strikaðir av ferðaætlanini, og í staðin verða gjølla lýstir í bløðunum, eins og aðrar broytingar verða væl lýstar í útvarpinum, so suðuroyingar vita, hvat teir veruliga hava at rætta seg eftir.

Av tí at tað er mær og øllum suðuroyingum ógreitt, hvør sum hevur tað avgerandi orðið viðvíkjandi gerð av ferðaætlanum fyri strandferðluna, loyvi eg mær sostatt — við formansins loyvi — at stilla landsstýrismanninum Olaf Olsen, sum hevur strandferðsluna undir hond, hesar spurningar.

Við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

15. november svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

uppá

fyrispurning frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi ferðaætlan fyri Suðuroyar siglingina.

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, hevur sett mær eini fyrispurning í fimm punktum.

Tað fyrsta er: Hevur landsstýrið nakran myndugleika til at ávirka planleggingina av ferðaætlanini fyri Teistan, áðrenn henda verður lýst at galda?

Hertil er at siga, at landsstýrið skal góðkenna ferðaætlanina og hevur soleiðis møguleikar til at ávirka hana.

Annað punkt er: Um játtandi svar, hevur landsstýrið so myndugleika til at krevja, at siglt verður úr Suðuroy kl. 7 á morgni í staðin fyri sum nú kl. 9 og kl. 10 flestu dagarnar í vikuni, um landsstýrið er sannført um, at tað gevur betri service á suðuroyarrutuni?

Landsstýrið hevur myndugleika til at broyta ferðaætlanina, men tað er fyrst og fremst Samferðslunevndin, sum skal royna at skipa so fyri, at siglingin verður løgd soleiðis til rættis, at hon tænir teimum best, sum skulu nýta hana. Síðani má leiðslan á Strandferðsluni gera vart við, um teir meta, at siglingin ikki kann gjøgnumførast, antin av økonomiskum ella av praktiskum grundum. Her kann nevnast, at suðuroyingar hava ávirkan á ferðaætlanina, m.a. tí at teir eru umboðaðir bæði í samferðslunevnd og í landsstýri.

Eftir uppskoti til ferðaætlan fyri restina av vetrinum er sigling úr Suðuroynni fleiri morgnar kl. 7.

Triðja punkt er: Hevur landstýrið myndugleika at bera so í bandi, at Teistin skal ferma tvær ferðir um vikuna til Vágs, um landsstýrið metir hetta vera neyðugt?

Sama ferðaætlanaruppskot hevur tveir túrar til Vágs um vikuna.

Fjórða punkt er: Hevur landsstýrið myndugleika til at áleggja leiðslu Strandferðslunnar, at broytingar í ferðaætlanini — eins og broytingar í broytingum — verða væl lýstar?

Landsstýrið kann — og vil — áleggja Strandferðsluni at lýsa broytingar í ferðaætlanini væl og virðiliga.

Fimta punkt er: Hevur landsstýrið nakran myndugleika at skera burtur teir túrar í Suðuroyar siglingini, sum suðuroyingar meta vera óneyðugar, og sum onga service geva suðuroyingum?

Um suðuroyingar eru samdir um, at Teistin siglir ov nógvar túrar til Suðuroyar, vil — og kann — landsstýrið umhugsa at minka um túratalið.

F.L.j.nr. 1800-6-3

---

Lagtingstíðindi 1982 A - 95

# 100-9. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann. Viðv. afturhald av skatti av pensjónum.

Ár 1982, mikudagin 10. november boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Karini Kjølbro, tinglimi, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**
**til**
**Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann**

Nær verður reglugerðin, sum eitt sameint løgting hin 6. apríl 1981 álegði landsstýrinum at gera viðvíkjandi innkrevjing av skatti, tikin í nýtslu.

**Viðmerkingar:**
Í februar í fjør legði tjóðveldisflokkurin fram uppskot á løgting um, at steðgað var við at leggja hald á uppihaldshjálp eftir forsorgarlógini í sambandi við skattaeftirstøður.

Fráfarna landsstýrið hevði árið frammanundan gjørt eina lógarbroyting, ið heimilaði skattamyndugleikunum at eftirhalda upp til 50% av eini inntøku.

At henda regla eisini skuldi galda fyri tær heilt lágu inntøkurnar eins og almennar pensjónir, var óvæntað, og var hetta orsøkin til hetta uppskot tjóðveldisfloksins um at seta eitt mark fyri, hvussu

ágangandi skattavaldið kundi vera í tílíkum førum. Málið varð beint í løgtingsins skattanevnd, sum í viðmerkingum sínum sigur, at undir samráðing við avvarðandi skattamyndugleikar er komið til ta niðurstøðu, at tað er skeivt eftir lógini frá 7. mars 1980 at taka 50% í øllum førum av eini inntøku. Eftirhaldast skal millum 0 og 50% alt eftir umstøðunum.

Ein samd skattanevnd setti tí fram uppskot um at áleggja landsstýrinum at gera eina reglugerð fyri innkrevjingararbeiðið hjá skattadeildini við tí fyri eyga at tryggja tí einstaka tað neyðuga til lívsins uppihald.

Tað eru nú 18 mánaðir, síðani henda samtykt varð gjørd, men skattadeildin heldur alsamt í mongum førum fram við at halda 50% aftur, eisini av teimum lágu inntøkunum og almennu pensjónunum. Úrslitið av hesum má metast at vera, at summi fólk í landi okkara liva at kalla undir hungursmarkinum. Við tað at landsstýrið eftir øllum at døma neyvan man hava somu áskoðan sum undirritaða, hvat hesum viðvíkir, verður í tráð við hendan spurning eisini settur fyrispurningur til landsstýrismannin í sosialmálum um, hvar landsstýrið metir krónuvirðið av hungursmarkinum í landi liggja.

Einki er at ivast í, at øll í løgtinginum ynskja, at so nógv sum gjørligt av útistandandi skattinum kemur inn, eins og fólk flest eisini sjálvi vilja gera sítt til fyri ikki at skylda skatt, serliga um tey kenna seg sannførd um, at tey øll, tá talan er um innkrevjing av gomlum skatti, fáa somu viðferð frá skattamyndugleikunum.

Ein fyritreytin fyri at arbeiða seg burturúr gomlum skatti má sigast at vera, at tú ikki ert óarbeiðsførur, av tí at ov lítið er til lívsins uppihald.

Tá talan er um fólka- og avlamispensjónistar, má tað verða felags áhugamál okkara politikkara, at ágangur skattavaldsins ikki gongur nærri, enn sosiala støða teirra annars loyvir.

Um landsstýrismaðurin í svari sínum annars vil vísa á §93 og §94 í kap. 16 í skattalógini, so er hartil at siga, at ilt er at skilja, hvussu hesar greinir skulu tulkast, m.a. tí dømi eru um, at sjálvt um fyritreytirnar um tungt hús og ringa heilsu eru til staðar, so verður kortini hildið so nógv aftur í skatti, at metast kann, at húskið hevur minni til lívsins uppihald enn tað, ið metast kann at vera hungursmarkið.

15. november varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

23. november svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**
**til**
**Karin Kjølbro, løgtingskvinnu**

Sambært tingsamtykt frá 6. apríl 1981 varð álagt landsstýrinum »at gera eina reglugerð fyri innkrevjingararbeiðinum hjá skattadeildini og í hesari reglugerð áseta minstamark fyri teirri upphædd, sum í hvørjum føri sær tørvar til lívsins uppihald«.

Reglugerðin, sum landsstýrinum varð álagt at gera, er lýst 13. apríl 1982, og av tí at tað ikki framgongur av fyrispurninginum, at løgtingskvinnan Karin Kjølbro er kunnug við hana, skal eg lesa reglugerðina.

**Reglugerð**
**um**
*innkrevjing av skattaeftirstøðum hjá persónum, ið fáa ávísar almannaveitingar.*

Við heimild í §98 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum (skattalógin) hevur Føroya Landsstýri ásett hesa reglugerð fyri virkið hjá skattainnkrevjingarvaldinum:

**§1.** Sambært §83, 1. og 2. stk. í skattalógini sum orðað við løgtingslóg nr. 18 frá 7. mars 1980 er heimild at halda aftur upp til helmingin av vinnuløn skattgjaldarans v.m. frokuað vinnuløn hjúnafelagans.

**§2.** Fær viðkomandi skattgjaldari ella hjúnafelagi, sum viðkomandi livir saman við, hjálp sambært §9 í forsorgarlóginí, er ikki loyvt at halda aftur fyri skattaeftirstøður í inntøku hjá viðkomandi skattgjaldara ella hjá hjúnafelaganum.

**§3.** Av øðrum almannaveitingum enn teim sambært §9 í forsorgarlóginí er bert loyvt at halda aftur fyri skattaeftirstøður so stóran part, sum semja er um millum innkrevjingarvaldið og Almannastovuna.

**§4.** Henda reglugerð kemur í gildi beinan vegin.

Av tí at landsstýrið ikki hevur hildið seg til at »áseta minstamark fyri teirri upphædd, sum í hvørjum einstøkum føri sær tørvar til lívsins uppihald«, er í reglugerðini fyrisett, at ikki er loyvt at afturhalda hjálp, ið veitt verður sambært §9 í forsorgarlóginí, og skal

haldast aftur í øðrum almannaveitingum, skal upphæddin í hvørjum einstøkum føri verða eftir avtalu millum innkrevjingarvaldið, t.e. Gjaldstovan og Almannastovan. Við hesi skipan skuldi trygd verið fyri, at ikki verður gingið skattgjaldaranum ov nær.

Landsstýrið er ikki vitandi um annað enn, at reglugerðin virkar eftir ætlan.

Tá løgtingskvinnan Karin Kjølbro førir fram, at landsstýrið eftir øllum at døma neyvan man hava somu áskoðan og hon á, hvat tørvur er til lívsins uppihald, so er hetta ein metan, sum tað stendur henni frítt fyri at hava. Men at landsstýrið, tá talan er um at afturhalda fyri skatt av láginntøkum, hevur mælt gjaldstovuni til at taka minni, enn loyvt er sambært §83, 2. stk. í skattalógini, eru fleiri dømi um.

F.L.j.nr. 430-12-36

---

# 100-10 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. ásetan av hungursmarki

Ár 1982, mikudagin 10. november boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Karini Kjølbro, tinglimi, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvar metir Føroya Landsstýri, at hungursmarkið liggur í krónuvirði fyri eitt vaksið fólk um mánaðin í landi okkara?

**Viðmerkingar:**

Hitt almenna hevur skyldu til at veita øllum hjálp, ið ikki eru før fyri at vinna sær og sínum hitt neyðuga til lívsins uppihald.

Hetta er endamálsgreinin í føroysku forsorgarlógini, ið hevur til endamáls at tryggja, at fólk ikki skulu líða hungur og hall. Henda hjálp liggur í krónuvirði á sama stigi sum vanliga fólkapensjónin.

Slík peninganøgd var í síni tíð mett sum minstamark, soleiðis at skilja, at um okkara leiðir var ikki hildið gjørligt at lívbjarga sær við minni.

Kortini hava mong í landi okkara verið noydd til at klára seg fyri minni av teirri orsøk, at ein løgtingssamtykt á vári í 1980 heimilaði skattavaldinum at taka upp til 50% av eini inntøku, tá fólk skyldaðu gamlan skatt.

Hetta er tó ein tulkingarspurningur, tí reglugerðin heimilar frá 0 og til 50.

Víst var á hetta brek í einum uppskoti frá Tjóðveldisflokkinum árið eftir, og allir løgtingslimir tóku undir við, at hetta var galið, og samtyktu tí við 29 atkvøðum móti ongari, at ein reglugerð skuldi fyribyrgja, at hin einstaki ikki hevði nóg mikið til lívsins uppihald.

Av tí at einki er hent í hesum máli, verður hervið spurt um, hvar landsstýrismaðurin metir hungursmarkið í krónuvirði í landi okkara fyri ein vaksnan persón at liggja. Hetta verður gjørt við tí fyri eyga at fáa eina løgtingssamtykt framda um, hvar markið skal vera, so skattamyndugleikarnir einki hava at ivast í, tá slík mál skulu viðgerast.

15. november varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

30. november svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Spurningurin var soljóðandi:

»Hvar metir Føroya Landsstýri, at hungursmarkið liggur í krónuvirði fyri eitt vaksið fólk um mánaðin í landi okkara?«

Spyrjarin vísir í sínum viðmerkingum til § 1 í forsorgarlógini, har sagt verður, at tað almenna hevur skyldu at koma einum og hvørjum til hjálpar, ið ikki er førur fyri at vinna sær og sínum tað neyðuga til lívsins uppihald.

Víðari sigur spyrjarin, at forsorgarlógin hevur til endamáls at tryggja, at fólk ikki skulu líða hungur og hall, og at forsorgarhjálpin í krónuvirði liggur á sama stigi sum vanliga fólkapensjónin.

Sum tað víðari skilst av viðmerkingunum, vil spyrjarin meina, at henda forsorgarhjálpin skal vera at skilja sum hungursmarkið, og at tann av undanfarna landsstýri innførda regla at heimila skattavaldinum at draga upp til 50% av inntøkuni, herundir forsorgarhjálp fyri skattaeftirstøður, dró hjálpina niður um hungursmarkið.

Landsstýrið hevur einki at viðmerkja til hesa útlegging, sum spyrjarin ber fram um, hvar á leið hungursmarkið kann hugsast at vera. Heitið »hungursmarkið« er jú eitt abstrakt innihaldsheimspekiligt hugtak og kann tessvegna ikki uttan víðari verða ásett í krónum og oyrum, uttan so er, at hetta verður gjørt við eini samtykt, og ein slík samtykt er ikki við í teimum ætlanum, sum landsstýrið hevur í hyggju at fremja í løtuni.

Uppskotsstillarin sigur annars í viðmerkingunum, at einki er hent í málinum viðvíkjandi at gera eina reglugerð, sum skuldi forða fyri, at hin einstaki ikki hevði nóg mikið eftir til lívsins uppihald vegna tess, at skattavaldið hevði drigið frá fyri skattaeftirstøður.

Hetta er skeivt. Reglugerðin varð lýst 13. apríl 1982. Annars verður víst til svar frá Tórbjørn Poulsen, landsstýrismanni, í løgtingsmáli nr. 100-9/1982.

F.L.j.nr. 1010-5

# 100-11 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. skúlanum á Trøðni

Ár 1982, mikudagin 10. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Jóannesi Dalsgaard, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Nær kunnu vit rokna við, at Skúlin á Trøðni (Føroya Spesialskúli) verður lagdur undir landsstýrisins myndugleika og landsstýrisins skúlafyrisiting?

**Viðmerking:**
Sambært §1 í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting er landsstýrið hægsti myndugleiki fyri skúlaskapinum í Føroyum, og landsstýrið fremur henda myndugleika gjøgnum eitt landsskúlaráð og eina skúlafyrisiting.

Eftir kapitli 5 í somu lóg er hetta eisini galdandi fyri skúlar, ið eru skipaðir sum sjálveigandi stovnar, og fyri privatar skúlar.

Hóast hesa lóg eru skúlar í Føroyum, ið ikki enn eru fluttir til myndugleika og fyrisiting landsstýrisins, og er ein av hesum Skúlin á Trøðni (Føroya Specialskúli).

Tað má metast at vera óheppið fyri allar avvarðandi partar, at ein skúli, ið hevur til endamáls at undirvísa brekaðum børnum, er uttan

fyri heimastýrisins fyrisiting, meðan ábyrgdin av allari undirvísing eftir lógini er hjá hesari somu fyrisiting.

Tað er tí av stórum áhuga fyri almenningin at fáa at vita, nær Skúlin á Trøðni eins og allir aðrir skúlar, ið undirvísa børnum, verður fluttur til landsskúlafyrisitingina og harvið til landsstýrisins myndugleikaøki.

Út frá hesum viðmerkingum loyva vit okkum at seta Eilif Samuelsen, landsstýrismanni í undirvísingarmálum, henda spurning.

Við — atkvøðum varð samtykt, at Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

16. december 1982 svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum frá Jóannesi Dalsgaard soleiðis:

**Svar**

»Nær kunnu vit rokna við, at Skúlin á Trøðni (Føroya Spesialskúli) verður lagdur undir landsstýrisins myndugleika og landsstýrisins skúlafyrisiting?«

Í skrivi frá 12. mars 1981 heitti eg vegna Føroya landsstýri á ríkisumboðsmannin um at skipa fyri, at sosialmálaráðið skjótast gjørligt tekur avgerð um, at Skúlin á Trøðni verður fluttur yvir til at verða umsitin eftir reglunum í 5. tátti í løgtingslóg um skúlafyrisiting.

Víst varð til álitið frá nevndini, ið viðgjørdi spurningin um yvirtøku av umsitingini av undirvísingarverkinum, har sagt verður, at yvirflutningurin av Spesialskúlanum kann verða framdur umsitingarliga í framhaldi av landsstýrisins yvirtøku av umsitingini av undirvísingarverkinum.

Í skrivi til donsku myndugleikarnar mælti ríkisumboðið til, at samráðingar verða tiknar upp millum avvarðandi myndugleikar um yvirflyting av umsitingini.

Eftir tilmæli frá sosialstýrinum hevur sosialmálaráðið sagt seg sinnað fyri, at Spesialskúlin verður fluttur yvir til føroyska undirvísingarverkið, og vil syrgja fyri, at skúlin verður fluttur undir myndugleika hjá undirvísingarmálaráðnum.

Undirvísingarmálaráðið hevur líkaleiðis sagt seg sinnað fyri, at umsitingin verður flutt yvir.

Í juli mánaði hevur sosialmálaráðið heitt á sosialstýrið um saman við direktoratinum fyri fólkaskúlan v.m. og føroysku myndug-

leikunum at fyrireika yvirflutningin av skúlanum til eitt tíðspunkt, sum partarnir koma ásamt um.

Fyrsti fundurin hevur verið í hesum mánaðinum, og eitt notat við uppskoti um loysn av málinum verður í næstum sent donsku myndugleikunum.

Nær málið verður endaliga avgreitt, er ilt at siga, men tað átti at kunnað væntast næsta summar.

F.L.j.nr. 2142-1

# 100-12 Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi bergholi Lopra-Sumba

Ár 1982, hósdagin 18. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Hilmar Bech, Atla Dam og Ove Mikkelsen, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hevur landsstýrið ætlanir um at fremja løgtingslóg nr. 92 frá 1. november 1978 og fara undir gerð av bergholi millum Lopra og Sumba í næsta fíggjarári?

**Viðmerkingar:**

Í september 1978 samtykti løgtingið lóg, ið heimilar landsstýrinum at skipa fyri gerð av bergholi millum Lopra og Sumba og taka neyðug lán til hetta endamál.

Orsøkin til, at uppskotið til løgtingslóg varð sett fram, vóru tey torføru og mangan vandafullu koyrilíkindini til Sumbiar.

Bæði síðsta vetur, tá bygdin lá uttan streym eitt skifti og uttan flutningssamband við aðrar bygdir fleiri ferðir, og aftur nú, tá somu trupulleikar endurtaka seg við samferðsluni orsakað av vindi, kava o.ø., verða vit mint um, hvussu truplum og vandafullum umstøðum tey 400-500 fólkini liva undir, sum hava bústað sín sunnan fyri Hestin; tí er ongantíð ov skjótt, at hetta málið verður loyst, tí eitt møguligt helikoptarasamband kann einans verða ein neyðloysn og loysir ikki teir dagligu trupulleikarnar.

Í hesum sambandi kann verða víst til, at bergholsgerðin til Leirvíkar varð samtykt í sama líki og um somu tíð sum omanfyri nevnda løgtingslóg, og har er skjøtil settur á í verandi fíggjarári, tí má tað haldast vera náttúrligt, at bergholsarbeiðið Lopra-Sumba eigur at byrja í komandi fíggjarári, og landsstýrið solciðis vísir vilja til at loysa hetta málið í Suðuroynni og fremja nevndu løgtingslóg, sum løgtingið hevur givið landsstýrinum heimild til.

22. november varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

30. november svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Spurningur: Hevur landsstýrið ætlanir um at fremja løgtingslóg nr. 92 frá 1. november 1978 og fara undir gerð av bergholi millum Lopra og Sumba í næsta fíggjarári?

Svar: Sambært avtalu í samgonguni frá í vár er semja um at nýta 15 mió. kr. í hesum valskeiði til sekundera bergholsgerð, sum skal byrja 1. apríl 1983.

Landsstýrið og floksformenninir í samgonguni skulu avgera, hvar henda upphædd skal brúkast.

Tó er avgerðin um, hvar upphæddin skal brúkast, ikki tikin enn.

F.L.j.nr. 1817-50.

# 100-13 Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann, viðvíkjandi veiðu og sølu av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski

Ár 1982, týsdagin 30. november boðaði formaðurin frá fyrispurnigi frá Hans M. Joensen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hin 26. februar 1982 gjørdi løgtingið við 28-0 atkvøðum soljóðandi samtykt:

»Landsstýrinum verður álagt saman við avvarðandi stovnum, ráðum og vinnulívsmonnum at leggja fyri løgtingið so skjótt, sum til ber, og ikki seinri enn 1. november 1982 miðvísa ætlan um, hvussu veiði, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað, soleiðis at tjóðarbúskapurin fær sum mest burtur úr hesum fiskasløgum, og at streingja á, at sett verður TAC á svartkjaftastovnin, so skjótt sum til ber.«

Nú ið november mánaður er farin aftur um bak, og einki er frætt frá landsstýrinum um nakra slíka ætlan um, hvussu veiði, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað, verða landsstýrismanninum settir hesir spurningar:

1. Hvi er slík ætlan ikki enn løgd fyri tingið?
2. Hvat hevur landsstýrið higartil gjørt til tess at fáa slíka ætlan gjørda?
3. Nær kann henda ætlan væntast at verða liðug og løgd fyri løgtingið?

Somuleiðis verður landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa, hvat ið er hent viðvíkjandi spurninginum um TAC fyri svartkjaftaveiðu.

3. december 1982 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

19. januar 1983 svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

»Landsstýrinum verður álagt saman við avvarðandi stovnum, ráðum og vinnulívsmonnum at leggja fyri løgtingið, so skjótt sum til ber, og ikki seinri enn 1. november 1982 miðvísa ætlan um, hvussu veiði, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað, soleiðis at tjóðarbúskapurin fær sum mest burtur úr hesum fiskasløgum, og at strcingja á, at sett verður TAC á svartkjaftastovnin, so skjótt sum til ber.«

Hareftir setir hann mær hesar 4 spurningar:

1. Hví er slík ætlan ikki enn løgd fyri tingið?
2. Hvat hevur landsstýrið higartil gjørt til tess at fáa slíka ætlan gjørda?
3. Nær kann henda ætlan væntast at verða liðug og løgd fyri løgtingið?
4. Somuleiðis verður landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa, hvat ið er hent viðvíkjandi spurninginum um TAC fyri svartkjaftaveiði.

Til tríggjar teir fyrstu spurningarnar er at siga, at tað er torført og tekur langa tíð at gera eina fullfiggjaða ætlan sum tilskilað í samtyktini. Viðvíkjandi svartkjaftinum var eitt notat frá løgmanni og

mær lagt fyri tingið 26. februar í fjør, og er tað partvíst svar uppá hesar spurningar.

Í øðrum lagi er tilmælið, sum Fiskivinnuráðið hevur latið landsstýrinum, og sum tingmenn eisini hava fingið, eisini ein partur av svarinum, við tað at landsstýrið í stóran mun ætlar at fylgja tilmælinum.

Í triðja lagi verða framvegis gjørdar royndir við skeljafiski og høgguslokki, bæði viðvíkjandi veiðu, tilvirking og sølu, so her kann ikki vera nøkur endalig ætlan enn um, hvussu hetta skal skipast, men her verður arbeitt, og higartil eru tað — serliga við skeljafiskinum — gjørd framstig.

**Ad 4.** Viðvíkjandi TAC á svartkjafti er tað hent, at vit hava reist spurningin í ICES og síðani í tí endurstovnaða NEAFC, men enn hevur ikki eydnast at fáa onnur lond við til at seta TAC á svartkjaft, men vit royna framvegis at fáa tað framt. Annars verður vist til hjáløgdu frágreiðing frá fundi í NEAFC og frá fiskivinnusamráðingum við Noreg og Sovjetsamveldið.

F.L.j.nr. 1817-50

---

*Brot úr fundarfrágreiðingum:*
NEAFC: 22.-25. november 1982

. . . . . .

»Vit skutu tí upp, at NEAFC samtykti eitt TAC fyri allan stovnin, og gjørdu av, hvussu stórur parturin av TAC kundi veiðast á víðum havi, og um hetta var møguligt, so eisini býtið millum økini hjá teimum strandalondum, har svartkjafturin gekk.«

. . . . . .

Fiskivinnusamráðingar við Noreg 20.-21. december 1982:

. . . . . .

»Blåhvilling (kolmule).
Parterne var enige om behovet for fastsættelse af en TAC for denne bestand i lys af videnskabelig rådgivning.«

. . . . . .

Fiskivinnusamráðingar við USSR 8. december 1982:

. . . . . .

»Í sambandi við mál 9 í dagsskránni, ymiskt, søgdu partarnir frá, at teir kundu ynskt eitt nærri vísindaligt samstarv og í hesum sambandi luttøku í millumlanda vísindaligum samstarvi viðvíkjandi svartkjafti, millum annað við tí í hyggju at áseta eitt TAC fyri hendan stovn.«

. . . . . .

# 100-14 Fyrispurningur til løgmann
# 34 ymiskir fyrispurningar

Ár 1983, fríggjadagin 3. december boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Erlendi Patursson, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Nær verður roynt at tarna og vinna á inflatiónini?
2. Nær verður lætt um skattabyrðar teirra inntøkuveiku?
3. Nær fáa løgting, fíggjarnevnd og fyrisiting upplýsingar um fíggjarstøðu landsins?
4. Nær verður heildarætlan gjørd fyri fleiri ár í senn?
5. Nær verða nærri reglur gjørdar fyri almennari lántøku og fyri uttanlandslántøkur sum heild?
6. Nær verður almenn og privat nýtsla tálmað, og nær verða avgjalds- og rentufrádráttarreglur broyttar við hesum í huga?
7. Nær verða uppsparing og sjálvstrygging stuðlað?
8. Nær verður virksemi realkredittstovnsins endurskoðað og víðkað?
9. Nær verður tað, at avgjøld ikki óneyðugt tyngja neyðsynjarvørur?
10. Nær sleppur rávøra til framleiðslu undan tolli og avgjøldum?
11. Nær verður transit- og frígoymsla sett á stovn?
12. Nær verður farið undir at gera pensjóns- og aðrar sjálvstryggingar meiri fyrimunarligar fyri hin einstaka?
13. Nær verður tryggingarlóggávan endurskoðað?
14. Nær verða tey ymisku lønarløgini samskipað?
15. Nær verður munurin millum háinntøkur og láginntøkur minkaður?
16. Nær verður prísvøksturin tálmaður við effektivum príseftirliti?
17. Nær verður byrjað at royna at sleppa undan óneyðugum vørudýrkandi millumliðum?

18. Nær verður býti og skipan av heimasjógvi sett í verk?
19. Nær verður studningsskipan fiskivinnunnar og lógin um ráfiskagrunnin endurskoðað og gjørd einfaldari?
20. Nær verða reglurnar fyri veiting av kreppulánum til skip og virki endurskoðað?
21. Nær verður farið at minka um innflutningin?
22. Nær verður landbúnaðarroyndarstøðin bygd?
23. Nær verða grundarlagið og fyritreytirnar undir almannaveitingunum endurskoðað og lagað eftir føroyskum viðurskiftum?
24. Nær verður málið um andsveikraverndina loyst?
25. Nær verður endurbúgvingarstovnurin fingin at virka?
26. Nær verður barna- og dagrøktarskipanin umløgd soleiðis, at foreldur fáa fríari at velja ímillum at hava børnini heima og at lata tey á dagstovnarnar?
27. Nær verður umsorganin fyri teim eldru og brekaðu løgd soleiðis til rættis, at tey sum longst kunnu vera heima í egnum umhvørvi?
28. Nær verður kommunallógin endurskoðað?
29. Nær verður tann skipan gjørd, at býti av inntøkum og ábyrgd millum land og kommunur verður broytt soleiðis, at kommunurnar fáa størri part av skattligu inntøkunum, størri avgerðarrætt í kommunalum spurningum og størri ábyrgd av avgerðum sínum?
30. Nær verður kommunali lángrunnurin styrktur?
31. Nær verður fyrisitingin rationaliserað?
32. Nær verður slíkur virksamur skúla- og mentapolitikkur førdur, sum lagar seg eftir teimum korum og møguleikum, sum eru í samfelagnum?
33. Nær verður sjónvarpsmálið loyst?
34. Nær verður samferðslu- og flutningstænasta Strandferðslunnar kannað og raksturin rationaliseraður?

---

Tá ið núverandi landsstýri tók við í januar 1981, gav tað m.a. lyfti um at fremja tey mál, ið her eru nevnd. Nú ið tvey ár eru liðin av hesum landsstýrisskeiði, verður løgmaður biðin um at svara teimum spurningum, ið her eru settir.

6. december 1982 varð við 15 ja-atkvøðum, 9 atkvøddu ikki, og 8 vóru burturstaddir, ikki samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Poul J. Olsen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert,

Finnbogi Isaksen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen.

Burturstaddir: Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Hilmar Bech, Ove Mikkelsen, Hans M. Joensen, Jógvan Olsen.

F.L.j.nr. 200-15-2

# 100-15 Fyrispurningur til løgmann viðvíkjandi yvirtøku av undirgrund

Ár 1982, mánadagin 6. december boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Erlendi Patursson, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Í útvarpssamrøðu 2. december 1982 upplýsti løgmaður, at *»tað er ikki landsstýrið, sum førir samráðingar við donsku ríkisstjórnina um yvirtøku av undirgrundini,«* og at *»eg ikki kann átaka mær at biðja um undirgrundina.«*

Í samtykt løgtingsins 17. apríl 1975 verður sagt, at Føroya Løgting samtykkir, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnur verður yvirtikið sum føroyskt sermál, og at løgtingið *»áleggur landsstýrinum at halda fram við hesum samráðingum, hagar til málið er avgreitt.«*

Løgmaður verður tí biðin um at upplýsa, hvussu tað kann bera til, at landsstýrið *ikki* førir hesar samráðingar, soleiðis sum løgtingið í samtykt síni hevur álagt tí, og hvussu tað kann bera til, at løgmaður *skjýtur seg undan* teirri skyldu, sum løgtingið við samtykt síni eisini má haldast hava álagt honum, nevniliga at biðja um undirgrundina.

**Svar**

13. december 1982 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

2. mars 1983 svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Í fyrispurningi til løgmans, dagfestur 6. december 1982, spyr Erlendur Patursson, hvussu tað kann bera til, at landsstýrið *ikki* førir hesar samráðingar, soleiðis sum løgtingið í samtykt síni hevur álagt tí, og hvussu tað kann bera til, at løgmaður *skjýtur seg undan* teirri skyldu, sum løgtingið við samtykt síni eisini má haldast hava álagt honum, nevniliga at biðja um undirgrundina.

Í samgonguskjalinum er m.a. henda avtala gjørd:

»Samráðingar verða førdar við donsku stjórnina um at gera undirgrund Føroya og havbotnin til føroyskt sermál.

Í samráðingunum verður dentur lagdur á at tryggja, at einki verður at henda viðvíkjandi rannsóknum í og útvinningi úr undirgrundini og havbotninum uttan loyvi frá heimastýrinum.«

Í samráðingunum um samgongu vórðu teir tríggir samgonguflokkarnir samdir um, at samráðingarnar sambært samgonguskjalið vórðu leiddar av umboði, antin úr Fólkaflokkinum ella Sjálvstýrisflokkinum og ikki úr Sambandsflokkinum. Seinri varð avgjørt, at formaður Fólkafloksins, Jógvan Sundstein, skuldi vera samráðingarleiðari.

Fundir hava verið millum føroysku samráðingarnevndina, sum umframt embætismenn fevnir um Jógvan Sundstein, Hilmar Kass og Paula Ellefsen, og danska ríkismálaráðharran 22. august 1981 í Føroyum, 28. januar 1982 í Keypmannahavn og 12. oktober 1982 í Keypmannahavn.

Higartil eru partarnir vorðnir samdir um, at nevnd verður sett at kanna spurningin nærri.

Frá føroyskari síðu er sent uppskot til »kommissorium«, og verður nú bíðað eftir einum uppskoti til »kommissorium« frá danska ríkismálaráðharranum.

Nevnast kann, at full semja er í føroysku samráðingarnevndini um áðurnevnda »kommissorium«.

Tað, sum nevnt er frammanfyri, vísir, hví ikki bert landsstýri, men eitt breiðari »forum« førir samráðingarnar, og lýsir eisini, at løgmaður ikki hevur skotið seg undan síni skyldu, men tvørturímóti í fullari vissu hevur luttikið í arbeiðinum at samráðast um yvirtøku av føroysku undirgrundini.

# 100-16. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann, viðvíkjandi veiðu av botnfiski á Føroya-leiðini

Ár 1982, mánadagin 6. december boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Petur Reinert, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvussu ljóða tilmælini, sum fiskivinnuráðið nú fyri stuttum hevur latið landsstýrismanninum viðvíkjandi fiskivinnuni av botnfiski á Føroyaleiðini?

**Viðmerkingar:**

Tá annað mál var fyri her á tingi viðvíkjandi góðsku av fiski, varð eftir fyrispurning upplýst frá landsstýrismanninum Pálli Vang, at fiskivinnuráðið var komið við eini tilráðing um fiskiskap undir Føroyum, og at henda tilráðing nú var til kanningar í landsstýrinum.

Spurningurin er nú, um landsstýrið hevur lokið hesa kanning, og um tilmælini kunnu haldast at hava slíkan almennan týdning, at landsstýrið heldur, at tey eiga at leggjast fyri tingið, ella at tinglimir kunnu sleppa at síggja hesar tilráðingar.

13. december 1982 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

19. januar 1983 svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Petur Reinert, løgtingsmaður, spyr meg, hvussu tilmælini frá Fiskivinnuráðnum ljóða, sum eru latin mær.

Tilmælini eru útbýtt til allar tingmenn og harvið eisini til Petur Reinert.

F.L.j.nr. 1500-1-7-3

# 100-17. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann, viðvíkjandi sølu av saltfiskalastini hjá »Nónhamri«

Ár 1982, hósdagin 16. december boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Tá nú landið — landsstýrið — eigur, fíggjar og rekur m/t »Nónhamar«, hevur landsstýrið so heimild til at útbjóða saltfiskaveiðuna hjá »Nónhamri« í fríari sølu og selja hana til hægstbjóðandi søluprís?
2. Um slík heimild er til staðar, og um slíkt verður gjørt, kann so tó ikki treytast, at P/f J.F. Kjølbro, sum rekur bátin fyri landsins rokning, um neyðugt og ynskiligt landar, pakkar og greiðir fiskin til útflutnings?

**Viðmerkingar:**

Landið — almennur peningur — eigur jú m/t »Nónhamar«, og verður báturin drivin fyri almenna rokning, men siglir út frá Klaksvík, sum eg meti at vera heilt náttúrligt og púra rætt, at báturin varð verandi í síni uppruna heimbygd.

Hin vegin hava væl allir partar áhuga fyri, at veiðan og serliga saltfiskaveiðan verður seld soleiðis, at mest møguligur vinningur fæst fyri veiðuna.

Tí meti eg tað vera rættast, at landsstýrið nú bjóðar søluna av saltfiskalastini fyri hvønn túr sær út í fríari kapping. Frí kapping er altíð ein fyrimunur, serliga tá talan er um sølu.

Sostatt loyvi eg mær at seta hesar spurningar fram til landsstýrismannin Olaf Olsen.

17. december 1982 varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

19. januar 1983 svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, spyr meg, um

1. landsstýrið hevur heimild til at útbjóða saltfiskaveiðuna hjá »Nónhamar« í fríari sølu, og
2. um so er, og um slíkt verður gjørt, at treyta, at p/f J.F. Kjølbro, um neyðugt og um ynskiligt, landar, pakkar og greiðir fiskin til útflutnings.

*ad 1.* Landsstýrið hevur latið raksturin av »Nónhamar« upp í hendurnar hjá p/f J.F. Kjølbro. Hereftir eigur p/f J.F. Kjølbro at reka trolaran soleiðis, at tað er til best møguligt úrslit fyri eigaran, sum er Føroya landsstýri. Hetta merkir sjálvandi, at p/f J.F. Kjølbro hevur skyldu til at selja veiðuna fyri best møguligan prís, men annars eigur landsstýrið ikki at leggja seg út í raksturin av trolaranum uttan so, at landsstýrið metir, at hann ikki verður rikin av nevnda reiðarí soleiðis, sum best er fyri eigaran, ella um landsstýrið vil selja hann.

*ad 2.* Eftir tí, sum er nevnt undir ad 1, skuldi ikki verið neyðugt at svara tí, sum nevnt er undir spurningi 2.

# 100-18. Fyrispurningur til ríkisumboðsmannin viðvíkjandi innflutningi av føroyskum mati til Danmarkar

Ár 1982, hósdagin 16. december, boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**
**til**
**Niels Bendtsen, ríkisumboðsmann**

1. Hví er framvegis bannað at innflyta grind til Danmarkar til persónliga nýtslu? — Her verður hugsað um grindatvøst og spik, feskt, saltað og turt.
2. Er orsøkin tann, at Danmark hevur millumlanda avtalur, sum banna fyri innflutning av hvalatvøsti (stórhvalatvøsti) og ella tvøst og spik av kópi? Mær vitandi er ongin friðingarlóg í nøkrum landi av grindahvali, og meti eg tí, at grindatvøst og spik er undantikið slíkum forboðum. Um ikki, ynskist at fáa at vita, nær og hvar slík friðing av grindahvali er gjørd og av hvørjum.
3. Um eg havi rætt viðvíkjandi grindatvøsti og spiki, vil ríkisumboðið so gera so væl at lýsa í bløðunum, at føroyingar, búgvandi í Danmark, hava loyvi til at móttaka grind, eins og ferðandi til Danmarkar hava loyvi at føra við sær tvøst og spik av grindahvali.
4. Kann ríkisumboðið vera við til at kunngera í Danmark og aðrastaðni uttanlands, at vit føroyingar ikki drepa grindahval einans fyri at drepa, men at grind verður slept, um avvarðandi sýslumaður metir, at nóg mikið er niðurfyri av grind í ávísum grindaøki.

**Viðmerkingar:**
Ríkisumboðið skal hava tøkk fyri, at hann fekk ávirkað, at vanligur føroyskur matur aftur kann flytast til Danmarkar til persónliga nýtslu, men enn er forboð fyri at innflyta grind og spik, og tí vil eg loyva mær at spyrja, hví hetta er bannað. Mær vitandi er grindahvalur ikki friðaður. Ríkisumboðið er væl eisini vitandi um, at føroyingar eta væl av grindatvøsti og spiki, bæði feskt, saltað og turt. Eins og spik verður etið saman við øðrum mati, so sum røstum fiski, bæði lakaspik og turt spik, eins og turt spik verður etið sum viðskeri og mett sum heilivágur.

Sjálvt um Føroyar í dag metast at vera eitt vælferðarsamfelag, so hevur grind og spik framvegis ein týðandi lut í tí føroyska húsarhaldinum, eins og heimlands matur er saknaður av einum og hvørjum, sum býr í útlegd, og altíð er sera kærkomin, um hann fæst til vega. Hetta er eisini galdandi fyri føroyingar í Danmark.

Ríkisumboðið er eisini vitandi um, at vit føroyingar ikki bert drepa grind fyri at drepa, og at tað javnan kemur fyri, at grind funnin ikki verður rikin, um mett verður, at íbúgvararnir í ávísari oyggj hava nóg mikið av grind niðurfyri, og sostatt eru fleiri grindir aftur sleptar í havið ella ikki verið fyri rakstri.

Sostatt fari eg at loyva mær at seta hesar spurningar fram.

Við 15-0 atkvøðum varð ikki samtykt, at ríkisumboðsmaðurin skuldi svara fyrispurninginum.

F.L.j.nr. 1103-21

# 100-19. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi fígging av arbeiði móti alkoholmisnýtslu, fyribyrging og hjálp

Ár 1983, hósdagin 20. januar varð fyrispurningur frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, fráboðaður, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hvussu langt er komið, og nær kann væntast, at landsstýrið, soleiðis sum løgtingið hevur álagt, kemur við lógaruppskoti um eitt eykagjald uppá kr. 0,05 pr. vektprosent alkohol á hvørja standard fløsku av øli, víni og rúsdrekka, tó undantikið ljóst øl?
2. Hvussu langt er komið, og nær kann væntast, at landsstýrið, soleiðis sum løgtingið hevur álagt, leggur fyri tingið lógaruppskot og reglugerð um hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu?

**Viðmerkingar:**

Havandi í huga og vísandi á nakrar av teim døpru avleiðingum, ið standast av alkoholmisnýtslu — fyri misnýtaran sjálvan, mangan fyri tey, ið avvarðandi eru, og fyri samfelagið sum heild — legði Framburðs- og Fiskivinnuflokkurin 13. februar 1981 fram uppskot til samtyktar, har heitt varð á løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fyri tingið lóg um eitt cykagjald uppá kr. 0,05

pr. vektprosent alkohol á hvørja standard fløsku av øli, víni og rúsdrekka — tó undantikið ljóst øl.

Somuleiðis varð eisini heitt á løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot og reglugerð um hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu.

Í ljósinum av, at nærum heili 2 ár eru farin, síðan uppskotið varð samtykt við 20-0 atkvøðum — men einki enn er frætt frá landsstýrinum — og at mett verður, at tørvurin fyri hjálpiarbeiði móti alkoholmisnýtslu er vaksandi, er tað, at landsstýrismanninum verða settir hesir spurningar.

26. januar varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, soleiðis:

**Svar**

Eftir uppskoti frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum hevur tingið samtykt, at álagt verður landsstýrinum

1. at leggja fyri løgtingið lóg um eitt eykagjald upp á 5 oyru pr. vektprosent alkohol á hvørji standard fløsku av øli, víni og rúsdrekka, tó undantikið ljóst øl.
2. at leggja fyri tingið lógaruppskot og reglugerð um hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu.

Landsstýrið ásannar, at misnýtsla av alkoholi mangan kann føra álvarsligar avleiðingar við sær bæði fyri misnýtaran sjálvan, tey avvarðandi og fyri samfelagið sum heild.

Landsstýrið og løgtingið hava stuðlað arbeiðinum móti alkoholmisnýtslu við at seta av á fíggjarlógini 300.000 kr. seinastu árini til fráhaldsfeløg. Harafturat eru á fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi ár settar 300.000 kr. til rakstur av einum Blá Kross heimi í Havn. Eyðsæð er, at tørvurin fyri hjálparatgerðum er munandi størri, enn møguleikarnir í dag loyva.

Sambært viðhefta skjal metir gjaldstovan tað vera ógjørligt at umsita samtyktina, soleiðis sum hon er skotin upp av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og samtykt av løgtinginum. Deils er tað torført nágreiniliga at fastseta, hvat ein standard fløska er, og deils fer tað at verða sera arbeiðskrevjandi at umsita samtyktina í praksis.

Landsstýrið kundi tí hugsað sær at mælt løgtinginum til at seta á fíggjarlógina á hvørjum ári eina upphædd samsvarandi henni, ið kemur fram eftir einum slíkum útrokningarhátti, sum framgongur

av hjálagda skjali.

Henda upphædd verður at seta í ein grunn til fígging av arbeiðinum móti alkoholmisnýtslu.

Landsstýrið vil beinan vegin fara undir at gera eina reglugerð um hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu.

F.L.j.nr.

---

Innflutt rúsdrekka, vín og øl 1. nov. 1981 - 31. okt. 1982

**Rúsdrekka:**
225.530 ltr. á 43% alkh. = 300.706 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 300.700 fl. á 2,15 kr. ..... kr. 646.505,-

**Heitvín:**
29.628 ltr. á 18% alkh. = 39.504 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 39.500 á 0,90 kr. ..... kr. 35.550,-

**Borðvín:**
84.313 ltr. á 12% alkh. = 112.417 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 112.417 std. fl. á 0,60 kr. .... kr. 67.450,-

**A øl (gull):**
73.126 ltr. á 4,15% alkh. = 208.931 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 208.930 std. fl. á 0,20 kr. .... kr. 41.786,-

**I øl (hof v.m.):**
117.151 ltr. á 3,2% alkh. = 334.717 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 334.717 fl. á 0,15 kr. ..... kr. 50.207,-

**Framleitt A øl (gull): jan-dec. 1982:**
707.313 ltr. á 4,15% alkh. = 2.020.894 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 2.020.894 fl. á 0,20 kr. ..... kr. 404.178,-

**Framleitt I øl (hof v.m.)**
456.446 ltr. á 3,2% alkh. = 1.304.131 std. fl.
Gjald at seta í grunn: 1.304.131 fl. á 0,15 kr. ..... kr. 195.619,-

Inntøka ialt við eykagjaldi uppá 5 oyru
pr. vektprocent alkohol á hvørja std. fløsku
av rúsdrekka, víni og øli ..... kr. 1.441.295,-

Viðmerkjast skal, at tað er púrasta ógjørligt at umsita samtyktina, ið m.a. er grundað á standard fløskur.

Í omanfyristandandi uppstilling hava vit gingið útfrá, at ein standardfløska av rúsdrekka, heitvíni og borðvíni inniheldur 0,75 ltr. Hetta er ikki beint, men ikki er gjørligt at koma til rætta talið. Innan fyri borðvín finnast standardfløskur, ið innihalda upp til 5 ltr., og 2 ltr. og 1 1/2 ltr. er heilt vanligt. Innan fyri heitvín og rúsdrekka eru fløskur, ið innihalda 1 ltr. vanligar std.-fløskur.

Eftir løgtingssamtyktini gerst inntøkan til grunnin størri og størri, um standardfløskurnar gerast smærri.

FØROYA GJALDSTOVA, tann 20. jan. 1983
Á. Midjord

# 100-20. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi umrøðu av áliti frá ráðleggingarnevndini fyri sjúkrahúsverkið

Ár 1983, mikudagin 23. januar varð boðað frá einum fyrispurningi frá Karini Kjølbro, løgtingslimi, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Nær kemur álitið dagfest 1. august 1980 frá Ráðleggingarnevndini fyri sjúkrahúsverkið í Føroyum til umrøðu á tingi?

**Viðmerkingar:**
Ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsverk Føroya varð sett sbr. lóg nr. 621 frá 22. december 1976 fyri Føroyar um sjúkrahúsverkið. Nevndin handaði landsstýrinum álit um útbyggingina av sjúkrahúsverkinum í august 1980.

Ætlanin við einum slíkum áliti má haldast at hava verið, at tað skuldi nýtast sum amboð fyri teir politikkarar, ið skulu taka avgerð í spurningum um framtíðar útbygging av sjúkrahúsverki okkara.

Frá hesum palli hevur áður verið spurt um, nær umrøðan av álitinum kemur fyri á tingi.

Nú má verða loyvt at gera vart við, at bíðað hevur verið alt ov leingi við hesi umrøðu, tí áður enn henda hevur verið, koma neyvan nakrar rciðiligar avgerðir at verða tiknar um framtíðina hjá hesum stóra og týdningarmikla øki innan heilsuverk okkara.

Av tí at eg meti málið at hava bráðskund nú, ikki miust eftir at álitið frá læknaráðnum á landssjúkrahúsinum frá oktober 1982 og viðmerkingarnar frá teimum trimum yvirlæknunum á Klaksvíkar og Suðuroyar Sjúkrahúsi frá januar 1983 eru komnar, er tað mín vón, at nevnda umrøða verður sett á dagsskrá á tingi sum skjótast.

Á seinri fundi sama dag varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang skuldi svara fyrispurninginum.

2. februar svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Nær kemur álitið dagfest 1. august 1980 frá Ráðleggingarnevndini fyri sjúkrahúsverkið í Føroyum til umrøðu á tingi?

*Svar:* Álitið frá Ráðleggingarnevndini og viðmerkingarnar frá heilsustýrinum, landslæknanum, læknaráðnum á landssjúkrahúsinum og yvirlæknunum á Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi koma til viðgerðar á løgtingi í mars mánaði í ár.

---

# 100-21. Fyrispurningur til Paula Ellefsen, løgmann, um umhvørvislógaruppskot

Ár 1983, mikudagin 26. januar var fyrispurningur frá Petur Reinert, løgtingsmanni, fráboðaður, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvussu langt áleiðis er landsstýrið komið við at gera uppskot til umhvørvislóg?

**Viðmerkingar:**

8. september í 1981 reisti tjóðveldisflokkurin renovatiónsmálið á tingi. Úrslitið varð m.a. eitt orðaskifti um umhvørvi sum heild, og kom fram undir hesum orðaskifti, at vit á hesum øki ikki høvdu fylgt við tíðini og ikki høvdu lóg ella lógir, sum umfataðu alt umhvørvið á sjógvi, á landi og í luftini. Endin á orðaskiftinum varð, at løgtingið setti serliga umhvørvisnevnd, sum hetta mál varð beint í. Aftan á fleiri fundir leggur henda nevnd álit fyri tingið hin 23. apríl 1982, og varð hetta uppskot samtykt við stórum meiriluta. Uppskotið varð soljóðandi:

»Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til umhvørvislóg, sum fevnir um umhvørvið á landi, á sjónum og í luftini, og at endurskoða heilsusamtyktirnar, so tær vera meira í samsvar við galdandi viðurskifti og komandi umhvørvis- og matvørulógir.«

Vanliga mannagongdin hevði vælsaktans verið at seta niður nevnd at gera hetta arbeiði, sum løgtingið hevur álagt landsstýrinum. Nú veit eg, at slík nevnd neyvan er sett og tí hesin fyrispurningurin til løgmans. Av hendingum í seinastuni hevði tað kanska verið rættari at spurt Olaf Olsen, landsstýrismann, men ikki er gott at vita, um hann situr í Tinganesi, tá svarast skal.

27. januar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

11. apríl las formaðurin skriv frá Peturi Reinert, løgtingsmanni, viðvikjandi svari uppá fyrispurningin og vísti til § 19 í tingskipanini.
27. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

27. januar 1983 hevur Petur Reinert, løgtingsmaður, sett mær soljóðandi spurning:

»Hvussu langt áleiðis er landsstýrið komið við at gera uppskot til umhvørvislóg?«

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður víst til løgtingssamtyktina frá 28. apríl 1982 í løgtingsmálinum nr. 23/1981, har álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til umhvørvislóg fyri landjørðina, sjógvin og luftina og at endurskoða heilsusamtyktirnar.

Saman við landsstýrinum hevur »Miljøstyrelsen« í december mánaði 1981 sett arbeiðsbólk at kanna spurningin um við kongaligari fyriskipan at seta lóg nr. 130 frá 9. apríl 1980 »om beskyttelse af havmiljøet« í gildi í Føroyum. Í arbeiðsbólkinum hevur landsstýrið verið umboðað av tveimum fulltrúm á landsskrivstovuni.

Arbeiðsbólkurin gjørdi uppskot sítt til kongaligu fyriskipanina liðugt á vári 1982. Uppskotið hevur síðani verið til viðgerðar í »Miljøstyrelsen« og í forsætismálaráðnum og er nú í mars mánaði sent landsstýrinum at taka støðu til at leggja fyri løgtingið. Málið verður allarhelst lagt fyri løgtingið í tingsetuni 1983.

Tað er landsstýrisins støða, at hetta málið um sjóvarumhvørvið fyrst fær sína fullu viðgerð, áðrenn farið verður undir aðrar partar av umhvørvinum. Tær fyrisitingarligu kreftirnar avmarka, hvussu skjótt farið verður fram.

# 100-22 Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi djóraverndarlóg

Ár 1983, mikudagin 16. februar var fyrispurningur frá Karini Kjølbro, løgtingslimi, fráboðaður, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Hvussu røkist við arbeiðinum at fáa eina djóraverndarlóg?

**Viðmerkingar:**

Hesin spurningur var hin 19. mars 1982 settur landsstýrismanninum.

Í svari sínum segði landsstýrismaðurin, at fráfarna landsstýrið hin 3. juni 1980 setti ein arbeiðsbólk at koma við uppskoti um eina djóraverndarlóg.

Hin 14. januar 1982 læt hesin arbeiðshólkur landsstýrinum eitt uppskot, men kundi landsdjóralæknin ikki taka undir við hesum uppskoti orsakað av, at ein djóraverndarlóg viðkemur og rakar stórar bólkar í samfelagnum, sum hava við djór at gera.

18. februar 1982 samtykti landsstýrið at ganga ynskjum landsdjóralæknans á møti, og setti ein arbeiðsbólk eftir tilmæli frá landsdjóralæknanum við landfútanum, landsdjóralæknanum, hjálpardjóralæknanum, landbúnaðarráðgevaranum og einum skrivara frá umsitingini.

Í svari sínum segði landsstýrismaðurin at enda, at arbeiðsbólkurin var farin til arbeiðis.

Eftir tí, ið er komið fram til almenningin, so var ávíst álvarsamt djóravanrøktarmál boðað djóraverndarfelagnum í november í fjør.

Djóraverndarfelagið boðaði myndugleikunum frá beinanvegin, og tveir mánaðir seinni fer løgreglan á staðið og ásannar, at vanrøktin hevði fingið óbótaligar fylgjur.

Hesi viðurskifti okkara ómælandi eru okkum politikkarum til lítlan sóma.

Til tess at fyribyrgja slíkum kundu vit eitt nú havt sett lógaruppskotið frá fyrsta arbeiðsbólki í verk og latið tað virkað, til eitt møguligt broytt uppskot kom.

Leggjast má aftrat, at grundgevingin fyri at vraka uppskotið, tí tað rakar stórar bólkar í samfelagnum, er sjáldsom. Vit kunnu eisini siga, at júst tí at lógin viðvikur so mongum, skulu vit hava eina lóg.

Tað eru verjuleys djór, ið málið snýr seg um, og hesum ómælandi skulu vit tryggja móti yvirgangi.

17. februar var við 20-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

18. mars svaraði Páll Vang fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

uppá fyrispurning frá Karini Kjølbro, sum spyr, hvussu røkist fyri arbeiðinum at fáa eina djóraverndarlóg.

Nevndin, ið landsstýrið hevur sett, arbeiðir við at gera eitt lógaruppskot.

Tað ber ikki til í løtuni at siga, nær uppskotið verður handað landsstýrinum.

# 100-23 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, um forsorgarlógina og barnaforsorgarlógina

Ár 1983, mikudagin 2. mars varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurningum frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni, sum var settjóðandi

**Fyrispurningar**

Nær verða uppskot um broytingar í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini løgd fyri løgtingið?

**Viðmerkingar:**

Tann 9. september 1982 legði landsstýrið uppskot til samtyktar um broytingar í forsorgarlógini og í barnaforsorgarlógini. Hesar umhugsaðu broytingar høvdu borið við sær ávísar ábøtur til tað betra í nevndu lógum, soleiðis at korini hjá t.d. einari familju, sum verða rakt av sjúku, arbeiðsloysi ella øðrum óhappi, ikki skulu gerast munandi verri frá einum degi til annan.

Sum løgtinginum kunnugt hendi tað, at landsstýrismaðurin Eilif Samuelsen eftir trýsti frá ávísum samgonguflokkum tók hetta uppskot til samtyktar aftur (sí tingmál nr. 12/1982).

Javnaðarflokkurin, sum fult út ásannaði tørvin á hesum umhugsaðu broytingum, legði sama mál framaftur tann 17. september

1982 smb. tingmál nr. 21/1982. Hetta mál varð felt við 2. viðgerð tann 17. december 1982, og hevur fylgjan av hesum verið tann, at vit framvegis bert hava ta gomlu forsorgarlógina at ganga eftir. Hetta er sera óheppið fyri tey, sum eru víst til at klára seg við forsorgarhjálp. Sum fleiri ferðir ávíst av Javnaðarflokkinum er talan um upphæddir so smáar, at tær ikki røkka til dagligu útreiðslurnar hjá einum húski ella hjá einum støkum fólki.

Tað er tí av stórum týdningi fyri allar partar at fáa at vita, hvørja lagnu málini um broytingar í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini fara at fáa, og verður hesin spurningur tí settur landsstýrismanninum fyri almannamálum.

Fyrispurningurin varð afturtikin.

F.L.j.nr.

# 100-24 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, um orlov í sambandi við barnsburð og adoptión

Ár 1983, týsdag 8. mars var fyrispurningur frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni, fráboðaður, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Hvussu langt er komið áleiðis við tí arbeiði at endurskoða reglurnar um dagpening og orlov við barnsburð og adoptión, sum løgtingið álegði landsstýrinum í tingmáli nr. 162/1981?

**Viðmerkingar:**
Tann 18. mars 1982 legði Javnaðarflokkurin uppskot til løgtingslóg um orlov í sambandi við barnsburð og adoptión fyri løgtingið (tingmál nr. 162/1982).

Endamálið við uppskotinum var at geva barnakonum sum løntakara treytaleysan rætt til at vera burtur frá arbeiði í tilsamans 18 mánaðir, víðari var endamálið at lata faðirin eiga rætt til orlov í upp til 4 vikur við løn í sama tíðarskeiði, eisini var endamálið at javnstilla adoptivforeldur við onnur foreldur.

Sjálvt lógaruppskotið fall tann 24. apríl 1982.

Harafturímóti samtykti løgtingið í sama máli eitt uppskot frá Javnaðarflokkurin og eitt uppskot frá meirilutanum í lóganevndini um at áleggja landsstýrinum at skipa fyri, at reglurnar um orlov og dagpening við barnsburð og adoptión vórðu endurskoðaðar.

Tá tað nú er farið at líða ímóti einum ári, síðani henda samtykt varð gjørd, halda vit tað vera beint at seta landsstýrismanninum í sosialum málum, Eilif Samuelsen, henda fyrispurning.

14. mars varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

11. apríl svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni, soleiðis:

**Svar**

Jona Henriksen og Jóannes Dalsgaard spyrja um, hvussu langt er komið áleiðis við tí arbeiði at endurskoða reglurnar um dagpening og orlov við barnsburð og adoptión, sum løgtingið álegði landsstýrinum í tingmáli nr. 162/1981.

Spurningurin, sum settur er, kann býtast upp í tveir partar. Fyri tað fyrsta verður spurt um, hvussu arbeiðið at endurskoða reglurnar um dagpening við barnsburð og adoptión er komið áleiðis, og fyri tað næsta verður spurt um, hvussu langt er komið áleiðis við at endurskoða reglurnar um orlov við barnsburð og adoptión.

Til tann fyrra partin av spurninginum er at svara, at landsstýrið hevur sett niður ein arbeiðsbólk at viðgera málið um dagpening og herundir eisini um dagpening við barnsburð.

Til tann næsta partin er at svara, at í dag eru reglurnar um orlov við barnsburð og adoptión ásettar í teimum ymsu sáttmálunum. Harafturat hevur løgtingslógin um starvsmenn §6, stk. 2 og 3 frá 1958 ásetanir um orlov við barnsburð.

Landsstýrið arbeiðir við málinum um at endurskoða hesar reglur, m.a. hevur landsstýrið sett sær fyri at kanna lóggávuna í hinum norðanlondunum um orlov í sambandi við barnsburð og adoptión við tí fyri eyga at taka úr hesum lóggávum ásetanir, sum haldast mugu vera hóskandi at seta í gildi í Føroyum.

---

# 100-25 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, um hvørjar ætlanir landsstýrið hevur um at stovnseta útbúgving av sosial- og barnapedagogum á Føroya Læraraskúla

Ár 1983, hósdagin 24. mars var fyrispurningur frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni, fráboðaður, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið um at stovnseta útbúgving av sosial- og barnapedagogum á Føroya Læraraskúla?

**Viðmerkingar:**

Tað er framhaldandi ein ávísur førvur fyri útbúnum fólki til teir dagstovnar o.a., sum eru í Føroyum.

Útbúgving sum barnapedagogur fæst sum er bert, um ein fer uttanlands at útbúgva seg.

Ynskiligt var og betur fyri allar partar, um henda útbúgving verður í Føroyum.

Tað eru ungfólk, sum hvørt ár leita burtur at fáa sær hesa útbúgving.

Eftir tí, sum veitst, so eru umstøður at taka upp hesar útbúgvingar á Føroya Læraraskúla.

Við 21-0 atkvøðum varð 25. mars samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

11. aprfl svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurningi-num soleiðis:

**Svar**

Í løgtingslóg um læraraútbúgving frá 28. mai 1980 stendur í §4: »Landsstýrið kann gera av, at aðrar útbúgvingar í samarbeiði við læraraútbúgvingina kunnu setast á stovn við læraraskúlan.« Her var fyrst og fremst hugsað um útbúgving av barnagarðs- og frítíðar-pedagogum, sum tað eisini framgongur av viðmerkingunum til lógar-uppskotið.

Tað er landsstýrinum kunnugt, at hesi seinastu árini eru eini 10-15 fólk um árið farin til Danmarkar at søkja sær útbúgving á hesum øki. Landsstýrið hevur tí saman við Landsskúlafyrisitingini umhugsað møguleikan fyri, at henda útbúgvingin skal kunna fáast her á landi.

Ein nevnd er sett at kanna tørvin fyri útbúnum fólki á dag- og bústovnum, og um so er, at grundarlag er fyri at seta eina slíka útbúgving á stovn, verður farið undir at gera tær neyðugu fyri-reikingarnar hesum viðvíkjandi.

# 100-26 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi stovni fyri brekað

Ár 1983, hósdagin 7. apríl varð við 31-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin frá Hilmari Bech og Atla P. Dam skuldi verða svaraður.

**Fyrispurningur**

Hvussu langt er landsstýrið komið við fyrireikingunum til at skipa ein stovn fyri brekað, sum liggur í samtykt tingsins við keypinum av Loranstøðini og bygningunum Inni á Bakka í Vági (Løgtingsmál nr. 24/1979), og nær kann roknast við, at hesin stovnur fer at virka?

**Viðmerkingar:**

Tann 28. apríl 1980 samtykti løgtingið lóg, sum heimilaði landsstýrinum at taka upp lán til keyp av Loranstøðini í Vági.

Sambært samtyktini í løgtinginum var ætlanin at umbyggja húsini Inni á Bakka í Vági og nýta tey sum ein stovn fyri brekað.

Fyri umleið einum ári síðani upplýsti landsstýrismaðurin Eilif Samuelsen, at landsstýrið alsamt arbeiddi við at seta í verk ætlanir um stovnseting av vardum verkstað og vistarheimi í Vági eftir teimum sjónarmiðum, sum liggja í samtykt tingsins við keypinum av bygningunum í Vági.

Tá tað er av stórum týdningi, at ein slíkur stovnur verður skipaður og fer at virka, loyva vit okkum at seta fram omanfyri standandi spurning til landsstýrismannin í sosialmálum.

15. apríl svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:

»Hvussu langt er landsstýrið komið við fyrireikingunum til at skipa ein stovn fyri brekað, sum liggur í samtykt tingsins við keypinum av Loranstøðini og bygningunum Inni á Bakka í Vági (Løgtingsmál nr. 24/1979), og nær kann roknast við, at hesin stovnur fer at virka?«

Løgtingslógin um lán til keyp av Loranstøðini í Vági varð samtykt í tinginum 28. apríl 1980.

Danska fíggjarnevndin samtykti 11. februar 1981 at avhenda ognirnar til landsstýrið, og síðani hevur verið arbeitt víðari við at fáa tey neyðugu avhendingarskjølini, ognarbrøv v.m. sett upp. Somuleiðis hevur verið samráðst við hagastýrið um framhaldandi leigu av lendinum.

Ognarskiftið fór eftir ognarbrøvunum fram 1. apríl í ár, og seinasta fríggjadag 8. apríl vóru umboð fyri Farvandsdirektoratið í Vági og handaðu ognirnar til Føroya Landsstýri.

Tað er ætlan landsstýrisins, at ein sjálvsognarstovnur, »Vistarheimið í Vági«, skal reka heimið, ið fer at rúma umleið 8 fólkum at búgva og haraftrat fer at hava eina verkstaðardeild við plássi til umleið 15 fólk.

Stýrið fyri stovnin verður sett í hesum døgum, og fyrsta uppgáva tess verður at gera uppskot til reglugerð fyri stovnin.

Síðani skal stýrið saman við arkitektinum taka støðu til ta neyðugu umbyggingina, sum væntandi kann verða framd í hesum árinum, og ætlanin er, at stovnurin skal fara undir virki sítt, so skjótt umbyggingin er liðug.

# 100-27 Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann, viðvíkjandi ábótum á hoyrilíkindini hjá Útvarpi Føroya

Ár 1983, hósdagin 7. apríl varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin frá Tórálvi Mohr Olsen, løgtingsmanni, skuldi verða svaraður, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

1) Nær byrjar arbeiðið við at bøta um hoyrilíkindini á millumbylgju?
2) Verður neyðturviligur FM-umsetari settur upp í næstum, so fólk í Dali og aðrastaðni við kunnu fáa høvi til at hoyra útvarpið á FM?

**Viðmerkingar:**

Fólk í Dali á Sandoynni hava gjørt vart við, at Útvarp Føroya hoyrist illa bæði á millumbylgju og á FM, og til tíðir hoyrist útvarpið als ikki.

Onnur pláss í Føroyum hava somu trupulleikar við útvarpinum.

Hvat viðvíkur millumbylgjuni, so skilst, at stig eru tikin á komandi fíggjarlóg til tess at bøta um líkindini, og hesum stigi taki eg sjálvandi undir við.

Men á FM eru hoyrilíkindini alt ov vánalig, og tað er tí sera umráðandi at fáa bøtt um hesi viðurskifti, við at neyðturviligur FM-umsetari verður settur upp sum skjótast.

Eg fari tí at loyva mær at seta fram omanfyri standandi fyrispurning til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann.

15. apríl svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

1) Nær byrjar arbeiðið við at bøta um hoyrilíkindini á millumbylgju?
2) Verður neyðturviligur FM-umsetari settur upp í næstum, so fólk í Dali og aðrastaðni við kunnu fáa høvi til at hoyra útvarpið á FM?

*ad 1.* Á fíggjarlógaruppskotinum til hetta fíggjarár, samanber tingmál nr. 44 frá 15. dec. 1982, mælti landsstýrið til, at játtaðar verða 2,5 milj. kr. í 83/84 og 2,5 milj. kr. í 84/85 til byggjan av nýggjum millumbylgjusendara til Útvarp Føroya.

Telefonverkið hevði tá endað kanningarnar av útbreiðsluviðurskiftunum frá Skúvanesi, har gamla loranstøðin liggur, og vístu hesar kanningar, at støðin var væl nýtilig sum millumbylgjusendistøð.

Hin 11. febr. 1983 leggur telefonverkið álit fram um millumbylgjusendistøðina, og sambært gjørdu kostnaðarætlan kemur ein sendari við antennu og aðrari útgerð at kosta millum 7,5 og 10,5 milj. kr., alt eftir hvør útgerð verður vald. Telefonverkið mælir til dýraru loysnina.

Tingið tók undir viðgerðini av fíggjarløgtingslógini 83/84 ikki undir við minnilutaálitinum um at játta meiri pening til nýggja sendistøð. Sostatt er ikki nóg stór játtan tøk til, at farast kann undir bygging av nýggjum millumbylgjusendara í hesum fíggjarári.

*ad 2.* Tá farast skuldi undir 2. byggistig av FM-sendistøðunum, varð mett, at um hetta varð framt, komu allir íbúgvar her á landi at hoyra Útvarp Føroya á FM, samanber tingmál nr. 5 frá 6. august 1975. Hetta vísti seg ikki at vera heilt beint. Onkur bygd er eftir, sum ikki hoyrir útvarpið nóg væl, og ger hetta seg serliga galdandi, tá sent verður í stereo. Av hesum er Dalur helst ringast fyri.

Tá sendistøðirnar til almenna sjónvarpið verða bygdar, verður møguligt fyri ein lítlan meirkostnað at seta upp FM-umsetarar til tær bygdir, sum ikki hoyra Útvarp Føroya til lítar.

# 100-28 Fyrispurningur til løgmann viðvíkjandi havbotninum, um hann er føroyskur ella danskur

Ár 1983, hósdagin 7. apríl varð við 31-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum frá Adolf Hansen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Hvar í Heimastýrislógini, sum kom í gildi 1. apríl 1948, stendur, at havbotnurin ikki er føroyskur, ella at hann er danskur?

2. Í hvørji grein í Heimastýrislógini finst orðið havbotnur?
3. Hvar í Heimastýrislógini stendur, at undirgrundin ikki er føroysk, ella at hon er donsk?
4. Í hvørji grein í heimastýrislógini finst orðið undirgrundin, tá undantikið verður har orðið verður nýtt sum (staðbindandi) fyrisiting (lokaliserende forholdsord)?

27. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Í hesum máli hevur Adolf Hansen, løgtingsmaður, sett mær ymsar spurningar um havbotnin og undirgrundina í sambandi við heimastýrislógina.

Sum kunnugt er einasta staðið í heimastýrislógini, har orðið »undirgrund« er nevnt, á lista B. Har stendur: »Ráevni í undirgrundini« og »Råstoffer i undergrunden«. Hetta málsøkið, eins og hini á listanum, kann sambært §3 í lógini bert yvirtakast, um semja fæst í samráðingum um yvirtøkuna og um, hvussu víðfatandi yvirtøkan skal verða. Inntil tílík semja er fingin, er málsøkið ikki yvirtikið.

Havbotnurin er ikki nevndur.

Um møguleiki er fyri í semju at yvirtaka ikki bert ráevni í undirgrundini, men hitt større hugtakið undirgrundina sjálva, herundir havbotnin sum ein partur av undirgrundini, velst um, hvussu uppreksanin á báðum listunum í lógini er at skilja. Er uppreksanin úttømandi, er við strangari tulking og við óbroyttari heimastýrislóg eingin møguleiki fyri yvirtøku, tað er bert ein lin tulking, ið kann skapa henda møguleika. Um, hvør útleggingin er hin beina, eru tað 2 partar, ið gera av, og herafturat kemur, tá ið tað er lista B máf, ið umræður, at báðir skulu semjast um yvirtøkuna sjálva.


---


Løgtingstíðindi 1982 A - 101

RED: 10 X


Nasjonalbibliote


**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12





# RI





Na


N

Telephone: +47

# LØGTINGS
# TIDINDI

# 1982

# Løgtingstíðindi

Løgtingstíðindi 1982
© Føroya Landsstýri
Lagt til rættis: Ester Bech
Prenting: P/f Colour Print
Hefting: Helgi Justinussen

# Løgtingstíðindi
# 1982

**Bind B**

Skjøl til løgtingstíðindi

Førshavn 1985

# Innihaldsyvirlit

## Bind B

### Skjøl til løgtingstíðindi

### 1982


| | | Bls. | Løgtings-mál |
|---|---|---|---|
| Skjal 1 | Landskassarokningskapur 1982/83 ..... | 1 | |
| Skjal 2 | Fylgiskjøl til løgmansrøðuna 1982 ..... | 57 | |
| Skjal 3 | Føroyskt umboð í Norðurlandaráðnum ... | 103 | 2 |
| Skjal 4 | Avmarking av nýtslu av píkadekkum ..... | 109 | 15 |
| Skjal 5 | Veðhald fyri láni til SEV ..... | 139 | 17 |
| Skjal 6 A | Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1983/84 | 143 | 44 |
| Skjal 6 B | Fylgiskjøl til fíggjarløgtingslóg 1983/84 ... | 181 | 44 |
| Skjøl 6 C | Álit - fíggjarløgtingslógin 1983/84 ..... | 574 | 44 |
| Skjal 7 | Skipan millum Føroyar og Noreg um sín-ámillum fiskirættindi ..... | 630 | 51 |
| Skjal 8 | Skipan millum føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1983 ..... | 633 | 52 |
| Skjal 9 | Skipan millum Føroyar og EEC um sín-ámillum fiskirættindi í 1983 ..... | 641 | 55 |
| Skjal 10 A | Partapeningur í felag til keyp av millum-landa ferðamannaskipi - skjal ..... | 655 | 57 |
| Skjal 10 B | Sama - tekning ..... | 657 | 57 |
| Skjal 10 C | - - ..... | 658 | 57 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skjal 10 D | Rakstrarætlan ..... | 659 | 57 |
| Skjal 10 E | Yvirlit ..... | 674 | 57 |
| Skjal 11 A | Skúlabarnatannarøkt v.m. - Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om børnepleje ..... | 675 | 61 |
| Skjal 11 B | Sama - álit og tilmæli frá nevndini viðv. skúlabarnatannarøkt v.m. ..... | 677 | 61 |
| Skjal 11 C | sama - anordning om ikrafttræden ..... | 684 | 61 |
| Skjal 11 D | sama - Indenrigsministeriets bekendtgørelse | 686 | 61 |
| Skjal 11 E | sama- Lov nr. 217 af 19. maj 1971 om børnetandpleje ..... | 688 | 61 |
| Skjal 11 F | sama - Indenrigsministeriets bekendtgørelse nr. 347 af 8. juli 1971 om børnetandpleje .. | 690 | 61 |
| Skjal 11 G | sama - Yvirlit yvir, hvussu reglulig skúlabarnatannarøkt við tilnevndum skúlatannlækna er skipað í teimum ymsu læknadømunum pr. 31. december 1981 ..... | 692 | 61 |
| Skjal 11 H | Skúlabarnatannarøkt v.m. - skriv dagf. 16. juli 1975 frá Føroya Tannlæknafelag ..... | 694 | 61 |
| Skjal 11 I | sama - reglur fyri setan av barnatannlæknum | 700 | 61 |
| Skjal 11 J | Viðmerkingar til »Reglur fyri setan av barnatannlækna« ..... | 702 | 61 |
| Skjal 11 K | Sáttmáli um útlegan av kommunalari tannlæknastovu ..... | 703 | 61 |
| Skjal 11 L | Uppskot til skipan av miðvísari ortodontiskari viðgerð í Føroyum ..... | 704 | 61 |
| Skjal 12 A | Lóg um kreditkeyp - skriv dagf. 26.3.83 frá Brúkarafelagnum ..... | 706 | 68 |
| Skjal 12 B | sama - skriv dagf. 11.4.83 frá Sjóvinnubk. | 707 | 68 |
| Skjal 12 C | sama - skriv frá Havnar detailhandlarafelag dagf. 15.2.83 ..... | 708 | 68 |
| Skjal 12 D | sama skriv ódagf. frá ymiskum ..... | 709 | 68 |
| Skjal 12 E | sama - Felagið fyri Bilhandlarar og Verkstaðseigarar ..... | 710 | 68 |
| Skjal 13 A | Interkommunal ruskbrennistøðin á Saltnesi í Nes kommunu ..... | 711 | 76 |
| Skjal 13 B | sama - skriv dagf. 18.8.80 frá Nes Kommunu | 712 | 76 |
| Skjal 13 C | sama - skriv dagf. 30.3.82 frá Faroemnes Overfredningsnævn ..... | 713 | 76 |
| Skjal 13 C | sama - skriv dagf. 30.12.80 frá Nes komm. . | 714 | 76 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skjal 13 D | sama - skriv dagf. 5.11.82 frá Sakførara-felagnum Leif Waagstein v.fl. ..... | 720 | 76 |
| Skjal 13 E | sama - skriv frá sama dagf. 30.3.82 til Oversundhedskommissionen ..... | 721 | 76 |
| Skjal 13 F | sama - Notat viðv. avgerð hjá Yvirheilsu-nevndini 25.10.82 ..... | 723 | 76 |
| Skjal 13 G | sama - skriv dagf. 25.10.82 frá Oversund-hedskommisionen til adv. J.P.Lassen .... | 728 | 76 |
| Skjal 13 H | sama - skriv il J.P. Lassen frá Oversund-hedskommisionen ..... | 743 | 76 |
| Skjal 13 I | sama - skriv dagf. 16.12.82 frá Sakf. Leif Waagstein v. fl. .. ..... | 751 | 76 |
| Skjal 14 | Skattalóg (samtíðarskattur) ..... | 754 | 88 |
| Skjal 15 A | Setan av 6-manna nevnd at viðgera málið um, hvørji sjónarmið, ið skulu leggjast til grund fyri útbyggingini av sjúkrahús-verkinum ..... | 969 | 103 |
| Skjal 15 B | Skriv frá »sundhedsstyrelsen« viðv. út-bygging av sjúkrahúsverkinum ..... | 1000 | 103 |
| Skjal 16 | Veðhald fyri láni til Miðvágs kommunu .. | 1004 | 108 |
| Skjal 17 | Álit viðvíkjandi kommunulógini ..... | 1008 | 109 |
| Skjal 18 A | Rutukoyring í Vágum ..... | 1019 | 110 |
| Skjal 18 B | Udskrift af domsbogen for Færøernes rets-kreds ..... | 1021 | 110 |
| Skjal 18 C | Skriv frá Rutukoyrarum í Vágum ..... | 1025 | 110 |
| Skjal 18 D | Skriv frá Sørvágs kommunu ..... | 1026 | 110 |
| Skjal 18 E | Skriv frá Sørvágs kommunu ..... | 1027 | 110 |
| Skjal 19 | skjal til løgtingslóg um grundútbugving innan fyrisiting-, handils- og skrivstovu-økið ..... | 1028 | 119 |
| Skjal 20 | Álit viðvíkjandi løgtingslóg um frítíðar-undirvísing v.m. ..... | 1080 | 128 |
| Skjal 20 B | Uppskot til løgtingslóg um frítíðarundir-vísing v.m. ..... | 1110 | 128 |
| Skjal 20 C | Reglugerð fyri kommunalum stuðli til frí-tíðanfeløg í Klaksvíkar kommunu ..... | 1121 | 128 |
| Skjal 20 D | Skriv frá Felagsnevnd Føroya Kommunu-felags og Tórshavnar býráð til av gerð av egnum uppskoti um lóg um frítíðarundir-vísing v.m. ..... | 1123 | 128 |
| Skjal 20 E | Løgtingslóg um frítíðarundirvísing ..... | 1126 | 128 |

SKJAL 1

# LANDSKASSIN

## Rakstrarroknskapur 1982-83

og

## fíggjarstøða pr. 31. mars 1983

plaggstiðindi 1982 B - 2

# Viðmerkingar til landskassaroknskapin 1982/83

Fylgjandi **ognir**, sum eru fíggjaðar yvir § 13: Nýggir vegir, brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum, eru ikki upptiknar í landskassans roknskapi:

**Skerv- og asfaltverk**

| | Byggi-kostnaður | Niðurskr. til pr. 31.3.83 |
|---|---|---|
| Skervverkið í Porkeri | 3.619.280,00 | 2.225.225,00 |
| Skervverkið á Sandi | 1.206.399,00 | 377.014,00 |
| Skervverkið í Sandavági | 2.417.573,00 | 1.578.422,00 |
| Skervverkið í Hundsarabotni | 15.120.491,00 | 7.039.532,00 |
| Skervverkið á Lambarciði | 26.045.065,00 | 18.042.277,00 |
| Asfaltverkið í Hundsarabotni | 5.770.628,00 | 3.321.509,00 |
| Asfaltverkið á Lambarciði | 8.008.638,00 | 7.825.860,00 |
| Asfaltgoymslan í Hósvík | 7.735.025,00 | 4.100.823,00 |
| | 69.923.099,00 | 44.510.662,00 |

**Smiðjur og goymsluhús**

| | Byggi-kostnaður | Niðurskr. til pr. 31.3.83 |
|---|---|---|
| Maskinmiðstøðin | 8.550.000,00 | 6.053.800,00 |
| Goymsluhúsið í Kollafirði | 2.000.000,00 | 1.805.000,00 |
| Smiðjan á Oyggjarvegnum | 50.000,00 | 5,00 |
| Smiðjan á Lambareiði | 220.000,00 | 122.550,00 |
| Smiðjan í Norðdepli | 80.000,00 | 24.700,00 |
| Smiðjan á Sandi | 50.000,00 | 26.125,00 |
| Smiðjan á Sandi (í gerð) | 950.000,00 | 950.000,00 |
| Smiðjan í Øravík | 770.000,00 | 602.775,00 |
| Smiðjan á Nesi, Vági | 30.000,00 | 5,00 |
| Smiðjan í Kalsoynni | 100.000,00 | 71.250,00 |
| Smiðjan í Leirvík | 200.000,00 | 190.000,00 |
| Goymsluhúsið á Glaðsheyggi | 10.000,00 | 5,00 |
| | 13.010.000,00 | 9.846.215,00 |

Fylgjandi **skuld** pr. 31. mars 1983 er ikki bókførd í landskassans roknskapi:

| | |
|---|---|
| Keyp av maskinum (mobilar) upp á avgjald | 5.474.880,00 |
| Keyp av útgerð til skerv- og asfaltverk upp á avgjald | 5.000.000,00 |
| | 10.474.880,00 |

Onanfyrinevndu upphæddir eru samsvarandi uppgávur frá Landsverkfrøðinginum.

Landskassans **uttanlands skuld** tann 31. mars 1983 sær soleiðis út:

| | | Skuld 31.3.83 | Bókført skuld | Skuld við kursi 31.3.83 |
|---|---|---|---|---|
| Exportfinans, Oslo | Nkr | 13.620.277,10 | 14.677.708,83 | 16.310.281,83 |
| Kreditbank, Luxembourg | Bfr | 72.000.000,00 | 9.262.400,00 | 12.895.200,00 |
| Westdeutsche Landesbank | DM | 21.800.000,00 | 58.202.275,96 | 77.499.000,00 |
| Algemene Bank, Holland | HFL | 20.000.000,00 | 51.825.708,05 | 63.150.000,00 |
| N.V.Bank voor Nederland | HFL | 20.000.000,00 | 55.747.292,27 | 63.150.000,00 |
| Manufactur Hanover Ltd. | US$ | 9.500.000,00 | 69.170.009,25 | 81.799.750,00 |
| 3 lán agent Handelsbank | US$ | 7.000.000,00 | 46.405.800,00 | 60.273.500,00 |
| 6 lán agent Privatbank | US$ | 9.625.000,00 | 58.892.271,89 | 82.876.062,50 |
| x) Nordfinanz Bank, Zürich | SFR | 10.000.000,00 | 41.876.625,00 | 41.490.000,00 |
| x) Nordic Bank, London | SFR | 3.350.000,00 | 13.660.630,00 | 13.899.150,00 |

x) Hesi lánini eru upptikin í 1982/83.

Viðvikjandi landskassans **veðhaldsskyldum** er at siga, at samlað yvirlit (fylgiskjal til landskassaroknskapin) veðheldur landskassin fyri 942.184.846 kr. og av hesum eru 73.292.148 kr. gjaldkomnar.

Tað er gjaldstovuni kunnugt, at roknskapurin viðvíkjandi veðhaldsskyldum ikki er eftirfarandi á ávísum økjum m.a. orsakað av tørvandi upplýsingum, ið ikki eru komnar gjaldstovuni í hendi.

**Eykafíggjarløgtingslógin** 1982/83 er prentað aftast í hesum roknskapi. Tað skal tó viðmerkjast, at lógin var ikki viðtikin av løftinginum, tá ið roknskapurin fór til prentingar.

Tann víttfevnandi **edv-umleggingin** í landsumsitingini, sum byrjaði í desember 1980, fer óivað at halda fram, men støðan er í løtuni tann, at fylgjandi stovnar hava beinleiðis terminal- og printarasamband við on line systemið á gjaldstovuni:

Landskassans høvuðsbókhald
Skattadeildin
Politikontórið
Politistøðin
Bileftirlitið
Landssjúkrahúsið
Landsverkfrøðingurin
Grannskoðaradeildin
Landsskrivstovan

og um stutta tíð koma eisini
Klaksvíkar sjúkrahús
og Suðuroyar sjúkrahás
inn á systemið.

Undir landskassans bruttoinntøkum framgongur, at endurgjøld ríkiskassans eru 257.848.323,69, men her skal tilskilast, at ríkiskassans partur av rakstrarútreiðslunum hjá Landssjúkrahúsinum, 70.504.128,03 kr., ikki er við í nevndu upphædd sum annars í undanfarnu roknskapum. Hetta er ein avleiðing av roknskaparumleggingini til on-line.

Hesin roknskapur er prentaður soleiðis:

400 eintøk av ársroknskapinum 1982/83
14 eintøk av kontolistum til roknskapin
14 eintøk av rakstrarstøðum, tó ikki § 13-1
14 eintøk av rakstrarstøðunum til § 13-1
14 eintøk av landskassans veðhaldsskyldum

P.S. Tá ið hesin roknskapur var farin til prentingar –- fyrsti korrekturur lisin - fekk gjaldstovan boð um, at rakstararyvirskotið hjá Útvarpi Føroya skuldi rættast til eitt rakstrarhall upp á 3.008.975,39 kr.
Rættingin er gjørd í sjálvum roknskapinum, men bókingin í landskassans statusroknskaparhaldi fer fram undir 1983/84.

# Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1982 - 83

(Samandráttur)

| | | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | | |
| (§ | 1) | Skattir | 521.905.618,76 | 488.000.000,00 |
| (§ | 2) | Toll- og framleiðslugjøld | 499.324.310,99 | 456.000.000,00 |
| (§ | 3) | Onnur gjøld | 1.169.677,32 | 610.000,00 |
| (§ | 4) | Inntøkur av spæli | 862.323,09 | 535.000,00 |
| (§ | 5) | Rentur og vinningsbýti | -13.576.280,81 | : 41.000.000,00 |
| (§ | 6) | Landsstovnar (sjá rakstrarstað 100) | -45.291.529,31 | -: 29.309.000,00 |
| (§ | 7) | Partur av avlopi danska tjóðarbankans | 19.196.147,79 | 2.500.000,00 |
| (§ | 8) | Aðrar inntøkur | 3.151,67 | 5.000,00 |
| | | | 983.593.419,50 | 877.341.000,00 |
| **Útreiðslur:** | | | | |
| (§ | 6) | Landsstovnar (sjá undir inntøkum) | | |
| (§ | 10) | Løgtingið | 8.014.878,92 | 7.730.000,00 |
| (§ | 11) | Landsumsiting | 56.585.019,86 | 52.965.000,00 |
| (§ | 12) | Heilsumál | 76.076.591,96 | 72.623.000,00 |
| (§ | 13) | Samferðslumál í grunnar | 89.700.000,00 | 89.700.000,00 |
| (§ | 13) | Vegir, brýr v.m. | 50.497.221,57 | 51.300.000,00 |
| (§ | 14) | Skúlamál | 84.278.813,94 | 79.706.000,00 |
| (§ | 15) | Vísind, bókmentir og list | 31.645.844,01 | 28.778.000,00 |
| (§ | 16) | Fiskivinna, sigling o.t. | 264.912.643,40 | 238.210.000,00 |
| (§ | 17) | Landbúnaður og matrikulering | 21.631.967,99 | 21.252.000,00 |
| (§ | 18) | Handil, iðnaður o.t. | 28.686.639,53 | 28.553.000,00 |
| (§ | 19) | Almannamál v.m. | 158.452.265,45 | 153.877.000,00 |
| (§ | 20) | Pensiónsútreiðslur | 3.437.393,85 | 3.694.000,00 |
| (§ | 21) | Effektivar veðhaldsbindingar í grunn | 6.000.000,00 | 6.000.000,00 |
| (§ | 22) | Aðrar og óvissar útreiðslur | 1.649.419,68 | 1.460.000,00 |
| (§ | 23) | At leggja í ymsar grunnar v.m. | -: 21.062.474,74 | 2.652.000,00 |
| (§ | 24) | Avdráttur av lánum | 0,00 | 0,00 |
| (§ | 25) | Avskrivingar | 53.518.765,81 | 37.700.000,00 |
| (§ | 26) | Ymsar ognarútreiðslur | 70.517,76 | 150.000,00 |
| | | Rakstraryvirskot 1982/83 | 69.497.910,51 | 991.000,00 |
| | | | 983.593.419,50 | 877.341.000,00 |

# Fíggjarstøða Landskassans pr. 31.mars 1983

(Samandráttur)

| | | Aktiv | Passiv |
|---|---|---|---|
| (§ 30) | Kassa-, banka-, sparikassa- og giropeningur | 19.760.158,49 | |
| (§ 31) | Virðisbrøv | 8.303.851,00 | |
| (§ 32) | Útlán | 148.588.802,89 | |
| (§ 33) | Inntøkueftirstøður | 402.625.232,81 | |
| (§ 34) | Aktiv tilhoyrandi grunnar | 391.524.724,08 | |
| (§ 35) | Aktiv hjá deponentum | 5.657.064,66 | |
| (§ 36) | Millumrokningar við kommunur | | 112.998.854,41 |
| (§ 36) | Millumrokningar við landsstovnar | 11.251.511,76 | |
| (§ 37) | Fastar ognir og annlegg | 27.304.453,90 | |
| (§ 38) | Skip | 96.470.799,01 | |
| (§ 39) | Millumrokning við nýtt figgjarár | | 22.241.073,24 |
| (§ 40) | Millumrokning, skuld | | 23.381.784,04 |
| (§ 41) | Lán | | 612.047.550,88 |
| (§ 42) | Deposita | | 19.712.821,52 |
| (§ 44) | Grunnar | | 397.076.623,39 |
| (§ 45) | Burturleggingar og avskrivingar | 216.856.560,69 | |
| (§ 46) | Kapitalkonti | | 77.847.425,94 |
| (§ 50) | Refusiónsmillumrokningar | 8.253.182,61 | |
| (§ 51) | Vinnulánsgrunnur løgtingsins | | 1.821.335,29 |
| (§ 61) | Skógfriðingarnevndin | 29.037,32 | |
| | Rakstraryvirskot | | 69.497.910,51 |
| | | 1.336.625.379,22 | 1.336.625.379,22 |

Viðvíkjandi ábyrgdum sjá undir fororðinum.

Føroya Gjaldstova, tann 2. januar 1984

**N. Rasmussen** **H. Mohr**

# Rakstrarroknskapur Landskassans fyri fíggjarárið 1982 - 83

**Vísandi bruttoinntøkur (ríkiskassans endurgjøld við) og bruttoútreiðslur**

(Kontobólkar)

| | | Inntøkur | Útreiðslur |
|---|---|---|---|
| Skattir | | 521.905.618,76 | |
| Toll- og framleiðslugjøld | | 499.324.310,99 | |
| Onnur gjøld | | 1.169.677.32 | |
| Inntøkur av spæli | | 862.323,09 | |
| Rentur og vinningsbýti | | 13.576.280,81 | |
| Partur av avlopi danska tjóðarbankans | | 19.196.147,79 | |
| Aðrar inntøkur | | 3.151,67 | |
| Endurgjøld: | | | |
| Ríkiskassin | 257.848.323,69 | | |
| Kommunur | 27.268.248,18 | | |
| Ymiskt | 1.291.472,56 | 286.408.044,43 | |
| Ymiskar inntøkur | | 65.634.994,74 | |
| Lønir og samsýningar | | | 251.206.633,28 |
| Ferðaútreiðslur | | | 7.815.879,27 |
| Útbúgving (skúlar v.m.) | | | 136.463,71 |
| Aðrar útreiðslur viðv. starvsfólki | | | 260.031,47 |
| Bussrutuútreiðslur | | | 5.363.627,90 |
| Eksteru kommunikatión | | | 1.448.616,67 |
| Húsaútreiðslur | | | 11.253.500,56 |
| Entréprenørrakstur | | | 105.520.162,67 |
| Skrivstovuútreiðslur | | | 15.406.961,05 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | | | 115.319.473,90 |
| Andveikraforsorgin (100% ríkið) | | | 20.063.418,88 |
| Ulykkesforsikringsrådet o.a. (100% ríkið) | | | 2.092.325,84 |
| Landssjúkrahúsið | | | 52.547.028,04 |
| Heilsumál | | | 1.418.100,82 |
| Skúlamál | | | 11.765.330,18 |
| Visind, bókment og list | | | 8.750.925,00 |
| | at flyta... | 1.380.927.987,98 | 610.368.479,24 |

| | Inntøkur | Útreiðslur |
|---|---|---|
| Flutt ..... | 1.380.927.987,98 | 610.368.479,24 |
| Fiskivinna og sigling ..... | | 249.489.244,49 |
| Landbúnaður og matrikulering ..... | | 15.001.612,13 |
| Handil, iðnaður v.m. ..... | | 25.146.944,43 |
| Almenn forsorg ..... | | 322.562.304,10 |
| Ymiskir studningar ..... | | 13.572.744,50 |
| Burturleggingar og avskrivingar ..... | | 38.456.291,07 |
| Samferðslumál ..... | | 36.832.457,51 |
| Rakstraryvirskot 1982/83 ..... | | 69.497.910,51 |
| | 1.380.927.987,98 | 1.380.927.987,98 |

# Specifikatión til 3000 - 6300 (§ 13)

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3000 | Anulegg av vegum ..... | | 26.828.227,98 |
| 3100 | Kommunal arbeiði ..... | | -103.417,35 |
| 3200 | Tunnil, Húsar-Mikladal ..... | | 11.192.441,37 |
| 3300 | Ábøtur av vegum ..... | | 2.585.220,02 |
| 3400 | Viðlikahald av vegum ..... | | 11.098.531,51 |
| 3500 | Vegarekkverk ..... | | 1.154.318,60 |
| 3600 | Kavagrevstur ..... | | 2.321.910,63 |
| 3700 | Vegstudningur ..... | | 7.076.554,26 |
| 3800 | Ferjulegur, viðlikahald ..... | | 2.245.537,40 |
| 3900 | Asfaltering, gamlir vegir ..... | | 2.808.102,02 |
| 5600 | Mobil amboð — rakstur/keyp .. | | 15.260.225,25 |
| 5700 | Smiðjur ..... | | 9.732.316,55 |
| 5800 | Skervverk ..... | | 9.349.969,54 |
| 5900 | Asfaltverk ..... | | 10.103.242,28 |
| 6000 | Havnir ..... | 60.534.840,84 | |
| 6100/6800 | Lendingar og bátahavnir ..... | 28.096.289,92 | |
| | Mótrokningar | -88.631.130,76 | 0,00 |
| | | | 111.653.180,06 |

# Specifikatión

til rakstrarroknskapin fyri figgjarárið 1982/83

## INNTØKUR

| (§ 1) | | Roknskapur | Figgjarlóg |
|---|---|---|---|
| **Skattir:** | | | |
| 1108 | Vanligur skattur | 489.073.234,00 | 459.000.000,00 |
| 1108 | P/F-vinningsskattur 20% | 71.143,93 | |
| 1108 | 40%-skattur | 1.081.753,03 | |
| 1108 | 35%-eftirlønargjald | 99.826,24 | |
| 1507 | Sjómansskattur | 10.682.972,00 | 10.000.000,00 |
| 1702 | Rentuskattur | 8.647.413,66 | 7.000.000,00 |
| 1804 | Vegskattur | 12.249.275,90 | 12.000.000,00 |
| | | 521.905.618,76 | 488.000.000,00 |
| (§ 2) | | | |
| **Toll- og framleiðslugjøld:** | | | |
| 2017 | Tollgjøld | 484.955.181,77 | 444.000.000,00 |
| 2708 | Framleiðslugjøld | 14.369.129,22 | 12.000.000,00 |
| | | 499.324.310,99 | 456.000.000,00 |
| (§ 3) | | | |
| **Onnur gjøld:** | | | |
| 3052 | Spiritusskamtanarkort | 153.131,00 | 200.000,00 |
| 3102 | Loyvisgjøld | 78.301,00 | 60.000,00 |
| 3204 | Arvagjøld | 879.968,62 | 300.000,00 |
| 3256 | Lestagjøld | 55.298,30 | 40.000,00 |
| 3501 | Bøtur | 2.978,40 | 10.000,00 |
| | | 1.169.677,32 | 610.000,00 |
| (§ 4) | | | |
| **Inntøkur av spæli:** | | | |
| 4011 | Happadrátturin | 487.680,10 | 250.000,00 |
| 4058 | Burturlutingargjøld | 102.246,33 | 60.000,00 |
| 4096 | V-4 | 272.396,66 | 225.000,00 |
| 4096 | Totalisatorgjøld og 15% uttanl.vinning | 0,00 | 0,00 |
| | | 862.323,09 | 535.000,00 |

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| (§ 5) | | | |
| **Rentur og vinningsbýti v.m.:** | | | |
| 5105 | Sektarrentur av skatti og pantigjald ... | 23.492.670,92 | |
| 5105 | Sektarrentur av motorgjaldi ..... | 120.279,49 | |
| 5105 | Rentur av banka-, spsk-, og giro innist.. | 2.010.752,95 | |
| 5105 | Rentur av útláni v.m. ..... | 8.327.845,20 | |
| 5105 | Rentur av obligatiónum og partabrøvum | 12.396,00 | |
| 5105 | Rentur av tollkreditti ..... | 1.887.113,16 | |
| 5105 | Rentur viðv. iløgugrunninum ..... | 705.481,44 | |
| | | 36.456.539,16 | 19.000.000,00 |
| 5207 | Rentuútreiðslur (upptikin lán v.m.) .... | : 50.032.819,97 | : 60.000.000,00 |
| | | ÷-13.576.280,81 | -: 41.000.000,00 |
| (§ 6) | | | |
| **Landsstovnar (rakstrarstøð 6014-6572):** | | | |
| 6014 | Strandfaraskip Landsins ..... | : 18.178.511,92 | -: 28.000.000,00 |
| 6028 | Strandfaraskip Landsins, Postverkið.... | ÷-1.697.083,35 | 0,00 |
| 6033-6085 | Bygdaleiðir ..... | : 3.043.451,43 | -. 2.551.000,00 |
| 6102 | Tjaldurs Apotekið ..... | 832.546,42 | 610.000,00 |
| 6204 | Telefonverk Føroya Løgtings ..... | -15.054.526,03 | 2.716.000,00 |
| 6306 | Útvarp Føroya ..... | ÷3.008.975,39 | 306.000,00 |
| 6358 | Postverk Føroya ..... | : 5.851.519,74 | -: 3.000.000,00 |
| 6408 | Oljugoymslur ..... | 828.937,26 | 696.000,00 |
| 6567 | Hvalastøðin við Áir ..... | ÷57.007,54 | : 20.000,00 |
| 6572 | Stórahús við Áir ..... | ÷-61.937,59 | ÷-66.000,00 |
| | | ÷-45.291.529,31 | -: 29.309.000,00 |
| (§ 7) | | | |
| **Partur av avlopi danska tjóðarbankans** | | | |
| sambært lóg: | | | |
| 7011 | Partur av avlopi tjóðarbankans ..... | 19.196.147,79 | 2.500.000,00 |
| (§ 8) | | | |
| **Ymsar inntøkur:** | | | |
| 8105 | Ymsar inntøkur ..... | 3.151,67 | 5.000,00 |
| | **Samantaldar inntøkur** ..... | 983.593.419,50 | 877.341.000,00 |

# ÚTREIÐSLUR

| (§ 10) | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGIÐ:** | | | |
| 10018 | Løgtingsmenn | 5.896.695,05 | 5.441.000,00 |
| 10106 | Løgtingshúsið | 379.290,23 | 465.000,00 |
| 10208 | Løgtingstíðindi og kunngerðarsavn | 494.827,42 | 537.000,00 |
| 10301 | Ekstern grannskoðan | 43.700,00 | 70.000,00 |
| 10403 | Intern grannskoðan | 1.097.509,20 | 1.049.000,00 |
| 10505 | Landsskattanevndin | 95.932,02 | 108.000,00 |
| 10607 | Norðurlandaráðið | 0,00 | 60.000,00 |
| 10709 | Norrønt samstarv | 6.925,00 | 0,00 |
| | | 8.014.878,92 | 7.730.000,00 |
| (§ 11) | | | |
| **LANDSFYRISITINGIN:** | | | |
| 11015 | Løgmaður og landsstýri | 1.449.212,75 | 1.515.000,00 |
| 11053 | Landsskrivstovan | 5.620.668,59 | 5.252.000,00 |
| 11103 | Fiskivinnustovan | 706.527,64 | 655.000,00 |
| 11155 | Uttanríkistænasta í Aberdeen | 426.804,09 | 374.000,00 |
| 11205 | Uttanríkistænasta í Keypmannahavn | 607.776,49 | 460.000,00 |
| 11257 | Líkningarráð Føroya | 3.480.106,94 | 3.084.000,00 |
| 11307 | Manntalsstovan | 921.340,99 | 868.000,00 |
| 11359 | Almannastovan | 3.678.292,08 | 3.714.000,00 |
| 11409 | Landsskúlafyrisitingin | 4.914.800,59 | 5.440.000,00 |
| 11452 | Føroya Gjaldsstova, Tórshavn | 15.041.994,74 | 12.003.000,00 |
| 11466 | Føroya Gjaldsstova, Klaksvík | 654.820,97 | 635.000,00 |
| 11471 | Føroya Gjaldsstova, Saltangará | 470.134,10 | 500.000,00 |
| 11485 | Føroya Gjaldsstova, Fuglafirði | 385.379,02 | 345.000,00 |
| 11499 | Føroya Gjaldsstova, Tvøroyri | 457.061,90 | 465.000,00 |
| 11502 | Føroya Gjaldsstova, Vági | 368.894,00 | 339.000,00 |
| 11516 | Føroya Gjaldsstova, Sørvági | 315.345,65 | 322.000,00 |
| 11549 | Endurgjald t. sýslur, f. skrivstovuhald | 50.918,15 | 40.000,00 |
| 11554 | Tolleftirlitið | 2.556.453,66 | 2.661.000,00 |
| 11568 | Trygdareftirlitið | 140.554,18 | 500.000,00 |
| 11604 | Valuta- og prísráð Føroya | 676.889,63 | 860.000,00 |
| 11656 | Lønarráðið | 3.723,96 | 6.000,00 |
| 11661 | Heilsu- og heimasjúkarsystraskipanin | 294.784,64 | 0,00 |
| 11706 | Búskaparráð | 1.557.493,18 | 1.753.000,00 |
| 11758 | Ferða- og dagpeningur | 2.380.777,21 | 1.750.000,00 |
| 11808 | Innheintingarútreiðslur | 44.952,53 | 50.000,00 |
| 11851 | Ognin Tinganes | 1.184.627,23 | 1.274.000,00 |
| | at flyta... | 48.390.334,91 | 44.865.000,00 |

| | | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|---|
| | | flutt ... | 48.390.334,91 | 44.865.000,00 |
| 11901 | Landsverkfroðingsskrivstovan ..... | | 7.194.684,95 | 7.100.000,00 |
| 11953 | Umsitingarhús í grunn ..... | | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| | | | 56.585.019,86 | 52.965.000,00 |

(§ 12)

**HEILSUMÁL:**

12109 **Landssjúkrahúsið:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur ..... | | 125.746.369,73 | 121.298.300,00 |
| ÷ sjúklingagjald ..... | 227.319,00 | | : 221.000,00 |
| ÷ ríkisstudningur ..... | 70.504.128,03 | | ÷ 67 939.300,00 |
| ÷ húsaleiga v.m. ..... | 2.467.894,66 | ÷73.199.341,69 | ÷2.307.000,00 |
| | | 52.547.028,04 | 50.831.000,00 |

12202 **Klaksvíkar sjúkrahús:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur ..... | | 27.071.486,02 | 25.150.000,00 |
| ÷sjúklingagjald ..... | 207.960,00 | | ÷193.000,00 |
| ÷ríkisstudningur ..... | 13.276.973,53 | | : 12.406.750,00 |
| ÷ húsaleiga ..... | 309.579,96 | ÷13.794.513,49 | : 143.500,00 |
| | | 13.276.972,53 | 12.407.000,00 |

12304 **Suðuroyar sjúkrahús:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur ..... | | 12.774.732,43 | 12.043.000,00 |
| ÷ymiskar inntøkur .... | 96.977,91 | | : 71.000,00 |
| ÷ríkisstudningur ..... | 6.338.877,26 | ÷6.435.855,17 | ÷ 5.986.000,00 |
| | | 6.338.877,26 | 5.986.000,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12406 | Heilsumiðstøðir í grunn: ..... | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| 12508 | Læknar ..... | 456.809,71 | 464.000,00 |
| 12601 | Ljósmøður ..... | 564.315,92 | 488.000,00 |
| 12653 | Heimasjúkrasystraskipan ..... | 1.439.899,75 | 1.046.000,00 |
| 12672 | Skúlalæknar ..... | 34.587,93 | 0,00 |
| 12907 | Ymiskar útreiðslur: | | |
| | Fursóttir ..... | 28.145,82 | 30.000,00 |
| | Karantenuútreiðslur ..... | 0,00 | 1.000,00 |
| | Sjúkrahjálp ..... | 2.877,00 | 2.000,00 |
| | Hvíldarheimið »NAINA« ..... | 349.200,00 | 350.000,00 |
| | Barnakonuferðir ..... | 11.078,00 | 2.000,00 |
| | Ferðaútreiðslur til barnakonur ..... | 26.800,00 | 16.000,00 |
| | | 76.076.591,96 | 72.623.000,00 |

| | | | | Rokn.skapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|---|---|
| (§ 13) | | | | | |
| **SAMFERÐSLUMÁL:** | | | | | |
| 5000-5900 | Nýggir vegir og brýr, | | | | |
| | breiðkan av brúm og umsiting ..... | | | 111.653.180,06 | 102.300.000,00 |
| | ÷endurgjald frá komm. | 8.288.416,00 | | | ÷8.000.000,00 |
| | ÷fíggjað úr grunni .... | 9.867.542,49 | | | |
| | ÷fíggjað við lánum .... | 43.000.000,00 | | ÷61.155.958,49 | ÷43.000.000,00 |
| | | | | 50.497.221,57 | 51.300.000,00 |
| | **Játtanir í grunnar:** | | | | |
| 13023 | Havnagerð ..... | | | 40.000.000,00 | 40.000.000,00 |
| 13037 | Lendingar ..... | | | 24.700.000,00 | 24.700.000,00 |
| 13042 | Flogferðsla ..... | | | 2.500.000,00 | 2.500.000,00 |
| 13061 | Berghols- og brúgvagerð ..... | | | 6.000.000,00 | 6.000.000,00 |
| 13089 | Byggi- og rakstrargrunnur Postverks. .. | | | 5.000.000,00 | 5.000.000,00 |
| 13075 | Studningur til kommunur til asfalter. .. | | | 6.500.000,00 | 6.500.000,00 |
| 13094 | Sekunder berghol ..... | | | 5.000.000,00 | 5.000.000,00 |
| | | | | 89.700.000,00 | 89.700.000,00 |
| (§ 14) | | | | | |
| **SKÚLAMÁL:** | | | | | |
| 14053 | Felagsútreiðslur f. skúlaverkið ..... | | | 165.681,81 | 338.000,00 |
| 14103 | **Fólkaskúlin:** | | | | |
| | Lærarløunir ..... | 89.969.140,46 | | | 86.000.000,00 |
| | Læraraeftirløunir ..... | 7.008.464,10 | | | 7.500.000,00 |
| | Skúlabarnaflutningur ... | 2.911.347,93 | | | 6.000.000,00 |
| | Ref. t. komm. 8. og 9. | | | | |
| | skúlaár ..... | 0,00 | | | 275.000,00 |
| | Ymiskt 100% statskassin | 8.113.699,85 | | 108.002.552,34 | 0,00 |
| | ÷endurgjald frá kommunum ..... | | | 0,00 | ÷3.000.000,00 |
| | ÷endurgjald frá ríkiskassanum ..... | | | ÷64.890.444,70 | ÷55.100.000,00 |
| | | | | 43.277.789,45 | 42.013.000,00 |
| 14155 | HF-skeið í Suðuroy ..... | | | 2.595.356,80 | 2.437.000,00 |
| 14169 | HF-skeið í Klaksvík ..... | | | 2.708.209,81 | 3.893.000,00 |
| 14174 | HF-skeið og studentaskúli í Gøtu ..... | | | 3.458.708,37 | 0,00 |
| 14205 | Studenta- og HF-skeið, Tórshavn ..... | | | 13.612.746,12 | 12.916.000,00 |
| 14257 | Kostdeild Studentaskúlans ..... | | | 1.600.110,09 | 1.529.000,00 |
| 14307 | Føroya Sjómansskúli ..... | | | 4.212.034,72 | 4.140.000,00 |
| | | | at flyta .... | **71.464.955,36** | **66.928.000,00** |

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| | flutt ..... | 71.464.955,36 | 66.929.000,00 |
| 14409 | Klaksvíkar Sjómannaskúli ..... | 1.068.250,39 | 1.355.000,00 |
| 14502 | Føroya Fólkahúskúli ..... | 1.441.619,00 | 1.318.000,00 |
| 14554 | Húsarhaldsskúlar ..... | 526.649,00 | 523.000,00 |
| 14604 | Kvøldskúlar ..... | 1.039.491,56 | 1.365.000,00 |
| 14901 | **Ítróttur:** | | |
| | Lánigrunnur til ítróttaranlegg ..... | 100.000,00 | 100.000,00 |
| | Studningur til Í.S.F. ..... | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| | Studningur til ferðir innanoyggja ..... | 1.010.770,00 | 450.000,00 |
| 14953 | **Ymiskir studningar:** | | |
| | Grunnurin til lærdan lestur ..... | 450.000,00 | 450.000,00 |
| | Grunnurin til annan lestur ..... | 150.000,00 | 150.000,00 |
| | Grunnur til lærlingar ..... | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | Landbúnaðarnæmingar ..... | 30.000,00 | 35.000,00 |
| | Ymisk framhaldsundirvísing ..... | 9.900,00 | 10.000,00 |
| | Skúlabarnaferðir, uttanlanda ..... | 54.080,00 | 60.000,00 |
| | Skúlabarnaferðir, innanoyggja ..... | 361.368,00 | 400.000,00 |
| | Ítróttar- og skúlabyggigrunnur ..... | 5.000.000,00 | 5.000.000,00 |
| | Næmingastudningur til listamenn ..... | 45.000,00 | 30.000,00 |
| | Føroya Skúlasavn ..... | 70.000,00 | 70.000,00 |
| | Meginfelag føroyska studenta ..... | 50.000,00 | 50.000,00 |
| | Norrøna Felagið ..... | 25.000,00 | 25.000,00 |
| | Studningur til fremm. ið lesa í Føroyum | 20.000,00 | 20.000,00 |
| | Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir ... | 11.188,63 | 17.000,00 |
| | Landsstýrinum at ráða yvir ..... | 150.542,00 | 150.000,00 |
| | | 84.278.813,94 | 79.706.000,00 |

(§ 15)

**VÍSIND, BÓKMENTIR OG LIST:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15109 | Føroya landsbókasavn ..... | 2.177.427,70 | 2.221.000,00 |
| 15202 | Fólkabókasøvn ..... | 2.252.125,00 | 2.527.000,00 |
| 15304 | Landsskjalasavn ..... | 750.680,24 | 789.000,00 |
| 15406 | Føroya Fornminnissavn ..... | 2.657.203,86 | 2.740.000,00 |
| 15508 | Bygdasøvn ..... | 141.999,08 | 150.000,00 |
| 15551 | Fiskirannsóknarstova ..... | 6.377.711,14 | 6.670.000,00 |
| 15653 | Fuglakanningarstøð ..... | 29.480,74 | 18.000,00 |
| 15703 | Føroya Náttúrugripasavn ..... | 1.015.404,31 | 994.000,00 |
| 15717 | Danmarks Geolog. Undersøgelse ..... | 367.178,58 | 310.000,00 |
| | at flyta .... | 15.769.210,65 | 16.419.000,00 |

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| | flutt.. ..... | 15.769.210,65 | 16.419.000,00 |
| 15722 | Jarðfrøðisligar boringar ..... | 109.502,14 | 0,00 |
| 15755 | Fróðskaparsetur Føroya ..... | 4.110.479,53 | 4.145.000,00 |
| 15793 | Stovnar á Debesartrøð ..... | 950.196,10 | 1.068.000,00 |
| 15805 | Heilsufrøðilig Starvsstova ..... | 1.379.498,10 | 1.407.000,00 |
| 15857 | Náttúrufriðingarnevndin ..... | 230.371,15 | 80.000,00 |
| 15895 | Tónleikur og sangur ..... | 551.444,74 | 600.000,00 |
| 15907 | **Ymiskir studningar:** | | |
| | Barnabløð ..... | 5.000,00 | 20.000,00 |
| | Sjónleikur ..... | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | Til útgávu av barnabókum ..... | 500.000,00 | 500.000,00 |
| | Sømdarpeningur til skald- og listafólk | 51.000,00 | 51.000,00 |
| | Lánigrunnur til bókaútgávu ..... | 100.000,00 | 100.000,00 |
| | Skúlabókaútgáva ..... | 700.000,00 | 700.000,00 |
| | Norðurlandahús í grunn ..... | 4.500.000,00 | 1.000.000,00 |
| | Sjónleikarhús í grunn ..... | 75.000,00 | 75.000,00 |
| | Fornminnissøvn í grunn ..... | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | Bókamiðsølan ..... | 220.000,00 | 220.000,00 |
| | Orðabókaútgáva ..... | 75.000,00 | 75.000,00 |
| | Mentunargrunnurin ..... | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | Føroya Listasavn v.m..... | 1.118.000,00 | 1.118.000,00 |
| | Savn í Hoyvík ..... | 500.000,00 | 500.000,00 |
| | Landsstýrinum at ráða yvir ..... | 101.141,60 | 100.000,00 |
| | | 31.645.844,01 | 28.778.000,00 |

(§ 16)

**FISKIVINNA, SIGLING o.t.:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16018 | Vrakurastovnur ..... | 1.715.078,72 | 1.686.000,00 |
| 16106 | Nautiskt royndarkamar..... | 38.724,25 | 35.000,00 |
| 16208 | Sjómansheim ..... | 140.000,00 | 140.000,00 |
| 16301 | Vaktar- og bjargingartænastan..... | ; 94.466,32 | ÷26.500,00 |
| 16315 | Vaktarskipið »Tjaldrið« ..... | 6.162.190,27 | 6.580.000,00 |
| 16334 | Vaktarskipið »Ólavur Halgi« ..... | 6.478.206,24 | 6.347.500,00 |
| 16403 | Laksa- og silaaling ..... | 559.702,00 | 800.000,00 |
| 16505 | Prísásetingarnevndir f. fisk ..... | 110.322,97 | 100.000,00 |
| 16607 | Fiskivinnuráð ..... | 166.881,30 | 223.000,00 |
| 16904 | **Studningur:** | | |
| | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna | 230.521.265,36: | 203.000.000,00 |
| | Grunn. til endurn. skipafl. ..... | 12.000.000,00 | 12.000.000,00 |
| | Grindir ..... | 46.535,88 | 25.000,00 |
| | at flyta | 257.844.440,67 | 230.910.000,00 |

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| | flutt ..... | 257.844.440,67 | 230.910.000,00 |
| | Fiskivinna á fremm. høvum ..... | 35.276,06 | 0,00 |
| | Havrannsóknarskip í grunn ..... | 400.000,00 | 400.000,00 |
| | Praktiskar fiskiroyndir ..... | 4.998.300,14 | 5.500.000,00 |
| | Vaktarskip í grunn ..... | 100.000,00 | 100.000,00 |
| | Útróðrarstøðir í grunn ..... | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| | Trygdargrunnur veiðimanna ..... | 354.696,00 | 200.000,00 |
| | Landsstýrinum at ráða yvir ..... | 166.253,53 | 100.000,00 |
| | Ref. av serlánspeningi ..... | 13.177,00 | 0,00 |
| | | 264.912.643,40 | 238.210.000,00 |

(§ 17)

**LANDBÚNAÐUR OG MATRIKULERING:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 17015 | Landsdjóralæknaembætið ..... | 561.727,47 | 508.000,00 |
| 17048 | Landbúnaðarráðgevari ..... | 246.363,24 | 244.000,00 |
| 17053 | Seyðaráðgevari og seyðaroyndir ..... | 119.021,65 | 119.000,00 |
| 17103 | Útskifting og matrikulstova ..... | 4.111.469,12 | 3.939.000,00 |
| 17205 | Royndarstøðin í Hoyvík ..... | 1.517.807,41 | 1.437.000,00 |
| 17901 | **Aðrir studningar:** | | |
| | Húsdjóraaling ..... | 225.000,00 | 225.000,00 |
| | Nýdyrking v.m. ..... | 1.500.000,00 | 1.500.000,00 |
| | Rentustudningur til landb.lán ..... | 1.800.000,00 | 1.700.000,00 |
| | Studn. til ílegging í landbúna ..... | 3.500.000,00 | 3.500.000,00 |
| | Studn. til mjólkaframleiðslu ..... | 5.850.000,00 | 5.850.000,00 |
| | Studn. til súrhoyggjabrunnar ..... | 875.000,00 | 875.000,00 |
| | Træplanting ..... | 700.000,00 | 700.000,00 |
| | Skeiðvirksemi ..... | 51.612,13 | 75.000,00 |
| | Hjálp til landbúnaðin í grunn ..... | 500.000,00 | 500.000,00 |
| | Landsstýrinum at ráða yvir ..... | 73.966,97 | 80.000,00 |
| | | 21.631.967,99 | 21.252.000,00 |

| | | | Rokniskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|---|
| (§ 18) | | | | |
| **HANDIL, ÍDNAÐUR o.t.:** | | | | |
| 18109 | Arbeiðseftirlitið | | 1.071.638,21 | 1.026.000,00 |
| 18152 | Brandvenjingarstøð | | 419.309,90 | 416.000,00 |
| 18202 | Bileftirlit | | 1.242.741,72 | 1.724.000,00 |
| | | **133.818** | **143.316** | | **166.506** | | **166.678** | **167.233** |
| | Ítróttta- og skúlabyggigrunnur .... | 13.500 | 10.500 | | | 16.000 | 16.000 | 16.000 |
| | Føroya Skúlasavn ..... | 70 | 70 | | | 70 | 70 | 70 |
| | Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir | 16 | 18 | | 26 | | 26 | 26 |
| | Læraraskúlanæmingar í Danmark . | 2 | 2 | | — | | — | — |
| | Frítíðarsk. fyri fólkaskúlalærarar .. | 10 | 10 | | — | | — | — |
| | Studn. frá ríkinum til fólkaskúla-bygging ..... | 6.500 | 7.000 | | 8.000 | | 8.000 | 8.000 |
| | Ferðaútreiðslur ríkið ..... | 89 | 100 | | 116 | | 116 | 116 |
| | Føroya Læraraskúli ..... | 7.757 | 7.047 | | 7.600 | | 7.600 | 7.600 |
| | Tekniskir skúlar ..... | 13.230 | 14.300 | | 15.700 | | 16.000 | 16.000 |
| | Handilsskúlin ..... | 3.312 | 3.525 | | 4.000 | | 4.000 | 4.000 |
| | Føroya Maskinskúli ..... | 2.633 | 2.633 | | 2.500 | | 2.500 | 2.500 |
| | Privatir skúlar ..... | 4.700 | 4.700 | | 5.300 | | 5.300 | 5.300 |
| | | **31.632** | **32.205** | | **35.100** | | **35.400** | **35.400** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Samlaðar útreiðslur fyri undirvísingarverkið | 185.637 | 193.220 | 225.818 | 226.290 | 226.845 |
| Ríkiskassaútreiðslur fyri undirvísingarverkið | 98.200 | 101.685 | 111.104 | | |
| Landskassaútreiðslur fyri undirvísingarverkið | 83.168 | 86.166 | 108.766 | | |

1) Her eru bert landskassans útreiðslur tiknar við.

**Almennar viðmerkingar:**
Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1983/84 fyri undirvísingarverkið hevur Landsskúlafyrisitingin roynt at taka við tær konti bæði úr løgtingsins fíggjarlóg fyri 1982/83 og tær játtanir undir undirvísingarmálaráðnum, sum lýsa, hvat føroyska undirvísingarverkið kostar.

Skúli á Trøðni er tikin við í uppskotinum, av tí at hann fór inn á undirvísingarmálaráðsins konto tann 1. januar 1980.

Við eru tiknir bæði sovorðnir undirvísingarstovnar, ið hava havt serliga konto á tí donsku fíggjarlógini, og teir, sum hava verið undir einum á eini samsvarandi konto á tí donsku fíggjarlógini. Fyri hesum stovninum viðvíkjandi hevur tað í Danmark nýtta fíggjarár (álmanakkaárið) verið brúkt, av tí at umrøddu stovnar antin eru ríkisstovnar burturav, ella fáa teir yvirhøvur bert studning úr ríkiskassanum.

Fyrisitingin hevur ikki kannað fíggjarætlanina hjá hesum stovnum gjøllari, av tí at hetta er gjørt í undirvísingarmálaráðnum í sambandi við framløguna av uppskoti til fíggjarlóg fyri 1983.

Fyri allar tær konti undir §14, sum hetta uppskot fevnir um, hevur Landsskúlafyrisitingin roynt at tikið allar útreiðslur fyri viðkomandi umráði við, uttan mun til, um tær verða goldnar av landsstýrinum, ríkinum ella øðrum. Uppskotið skuldi tí givið eina mynd av, hvat ið alt undirvísingarverkið kostar.

Tær upplýsingar, ið eru tøkar, fyri útreiðslur kommununnar til rakstur av fólkaskúlanum og til kvøldskúlan, verða ikki mettar at vera nóg nágreiniligar til at verða tiknar við í løtuni. Tó verður mett, at kommunurnar gjalda u. 20% av samlaðu rakstrarútreiðslum fólkaskúlans. Kommunuútreiðslurnar til kvøldskúlan eru 30% av læraralønunum v.m. við frádrátti av innskrivingargjaldi næminganna. Mett verður, at útreiðslurnar til hesi bæði mál, ið ikki eru tiknar við, eru 25 mió. kr.

Byggiútreiðslurnar eru tiknar við í tann mun, tað snýr seg um útreiðslur, ið verða goldnar av landskassanum ella ríkiskassanum.

Sum byggiútreiðslur verða roknaðar bæði beinleiðis útreiðslur og avseting til serligar grunnar, sum studningur til eitt nú fólkaskúlabygging í kommununum verður veittur úr.

Allar útreiðslur til undirvísingarmál eftir uppskotinum eru tilsamans 226 mió. kr. Av hesum verður endurgoldið úr ríkiskassanum 111 mió. kr., kommunurnar gjalda 6 mió. kr. Á henda hátt verða allar útreiðslurnar hjá landskassanum til undirvísingarmál 108,7 mió. kr. Nærri greining av endurgjaldinum sæst av viðmerkingunum til hvørja konto sær.

Tann hækking í samlaðu útreiðslunum til undirvísingarverkið frá 1982/83-1983/84, sum er uml. 33 mió. kr., er sundurbýtt millum hesar konti: 14103 Fólkaskúlin 7,4 mió. kr., 14205 Studentaskúlar og HF-skeið 11,2 mió. kr. og aðrar konti 14,4 mió. kr.

**Viðmerkingar frá landsskúlaráðnum:**

*ad § 15-2390/3211 Skúlabókaútgáva*
Eins og samtykt var á fundi í ráðnum 28. oktober 1980 í sambandi við viðgerðina av uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1980/81, so mælir Landsskúlaráðið til, at § 15-2390/3211, skúlabókaútgáva, verður at leggja undir § 14 undirvísingarverkið. Ráðið metir framvegis, at Føroya Skúlabókagrunnur náttúrliga hoyrir saman við undirvísingarverkinum.

*ad Rakstrarstaði nr. 14257 (rakstur av kostdeild Føroya Studentaskúla og HF-skeið) konto 213806 leiguútreiðslur.*

Mælt verður Føroya Landsstýri til at byggja kostdeild/kollegium til HF- og studentaskúlanæmingar heldur enn framvegis at skula gjalda tær á hesi konto nevndu leiguútreiðslur, sum eftir ráðsins meting eru alt ov stórar til hetta endamál.

Lasse Klein ynskti, at sett varð í gerðabókina, at hann ikki atkvøddi fyri uppskotinum um fíggjarløgtingslóg fyri undirvísingarverkið.

**Viðmerkingar til tey/tær einstøku rakstrarstøð/konti.**

*ad 73057, 73207 Endurgjald/ríkið/kommunurnar.*
Tær uppgivnu peningaupphæddir á hesum konti eru ávikavist samlaða endurgjaldið á øllum útreiðslukonti innan § 14. Í viðmerkingunum til tær einstøku útreiðslukonti er upplýst býtið av útreiðslum til landskassan, ríkiskassan og kommunurnar.

*ad 14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið*
Markið millum teir einstøku undirvísingarstovnarnar er ikki skarpt.

Lærararnir á teimum ymsu stovnunum undirvísa ofta á fleiri ymiskum stovnum; eisini kemur fyri, at somu viðurskifti viðvikjandi undirvísingini koma fyri á ymiskum stovnum.

Yvirtøkan av skúlafyrisitingini førir við sær, at nógv mál, sum áður hava verið umsitin av ríkisfyrisitingini, nú verða umsitin av Landsskúlafyrisitingini og teimum undirvísingarstovnum, sum liggja undir

henni.

Viðvíkjandi sjálvari undirvísingini eru gjørdar ella fara at verða gjørdar lógarbroytingar.

Hesi viðurskifti føra við sær, at í framtíðini verður størri tørvur enn áður á framhaldandi útbúgving fyri lærarar á teimum ymsu undirvísingarstovunum. Slík útbúgving kann fara fram á skeiðum, sum verða hildin bæði innanoyggja og uttanlands. Seinastu árini hava t.d. fakfeløg innan fólkaskúlalærarar hildið fleiri stuttskeið í Føroyum. Tann í uppskotinum nevndi peningur skal brúkast til studning til lærarar, sum skulu luttaka í fakligum skeiðum innanoyggja og uttanlands, og til skeið, sum verða fyriskipað av Landsskúlafyrisitingini, fakligum feløgum ella av øðrum.

Tá ið talan er um studning til luttakarar á skeiðum, hava allar útreiðslur í sambandi við luttøkuna møguleika at koma við sum grundarlag undir viðgerð av studningsveiting. Vanliga skulu kortini slíkar útreiðslur brúkast á konto hjá tí einstaka undirvísingarstovni. Støddin á studningunum fegar seg eftir, hvørjar útreiðslurnar eru, hvat skeið tað er, og hvørjir møguleikar eru fyri studningi frá øðrum.

Sum ein høvuðsregla kunnu lærarar frá øllum undirvísingarstovnum undir [illegible] skúlafyrisitingini fáa studning av hesi konto.

[illegible]. Fyrst av øllum brúkast sum studningur til lærarar í [illegible] undirvísingarstovnum, sum ikki hava serstaka konto til [illegible] í folkaskúlanum. Hon skal eisini brúkast í [illegible], lærarar luttaka í skeiðum, sum standa í sambandi [illegible] brúkast í teimum [illegible] brukt upp[illegible] [illegible] [illegible] [

3 mán., og av tí at bókaútgáva í Føroyum ikki er eitt lønandi arbeiði, má møguleiki skapast, fyri at teir fáa frí við løn. Skúlabókagrunnurin hevur í einstøkum føri givið stuðul til lærarar, men hevur hann ikki nóg góðan møguleika fyri hesum.

Landsskúlafyrisitingin metir, at slíkar útreiðslur eiga at verða bornar av konto 14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið, og er tí henda konto hækkað við 267.000 kr. í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1983/84.

*ad 73057 Endurgjald/ríkið*
Henda konto sæst ikki í høvuðsyvirlitinum. Tær endurgjaldingar og útreiðslur, henda konto fevnir um fyri ríkiskassanum, eru at finna á hvørjum einstøkum rakstrarstað.

Ríkiskassaútreiðslurnar á hesi konto eru fyri fíggjarárið 1983/84:

| | |
|---|---|
| Læraralønir | 51,019 mió. kr. |
| Eftirlønir | 6,120 mió. kr. |
| Skúlabarnaflutningur | 1,969 mió. kr. |
| **Útreiðslur til fólkaskúlan** | **59,108 mió. kr.** |
| Kvøldskúlin | 3,126 mió. kr. |
| Studningur til fólkaskúlabygging | 8,000 mió. kr. |
| Landsskúlasavnið | 0,174 mió. kr. |
| Skúlin á Trøðni | 7,291 mió. kr. |
| | **18,591 mió. kr.** |

Útreiðslur, sum landskassin ikki luttekur í:

| | |
|---|---|
| Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir | 0,026 mió. kr. |
| Ferðaútreiðslur/ríkið | 0,116 mió. kr. |
| Føroya Læraraskúli | 7,600 mió. kr. |
| Tekniskir skúlar | 15,700 mió. kr. |
| Handilsskúlin | 4,000 mió. kr. |
| Føroya Maskinskúli | 2,500 mió. kr. |
| Privatir skúlar | 5,300 mió. kr. |
| | **35,242 mió. kr.** |

*ad 73207 Endurgjald/kommunurnar*
Heldur ikki henda konto sæst á høvuðsyvirlitinum. Tær endurgjaldingar, henda konto fevnir um, eru at finna á hvørjari einstakari konto.

Útreiðslurnar hjá kommununum á hesi konto eru fyri fíggjarárið 1983/84: í 1000 kr.

| | |
|---|---|
| Skúlabarnaflutningur ..... | 3.938 |
| Kvøldskúlar ..... | 2.010 |
| **Samlaðar útreiðslur** | **5.948** |

*ad 14103 Fólkaskúlin*
Hetta rakstrarstað kann býtast upp í hesar konti í 1000 kr.:

| Konto | | Roknsk. 81/82 | Játtan 82/83 | Uppskot 83/84 |
|---|---|---|---|---|
| 73057 | Endurgjald ríkið ..... | ÷ 52.697 | ÷ 55.300 | ÷ 59.108 |
| 73207 | Endurgjald kommunurnar | ÷ 2.632 | ÷ 3.750 | ÷ 3.983 |
| 103127 | Løn/lærarar ..... | 83.800 | 86.000 | 92.761 |
| 103558 | Eftirlønir ..... | 6.606 | 7.500 | 7.650 |
| 253069 | Skúlabarnaflutningur .... | 5.265 | 7.500 | 7.875 |
| | **Samlaðar útreiðslur** | **95.671** | **101.000** | **108.287** |
| Ríkiskassi/kommunurnar ..... | | 55.329 | 57.238 | 63.046 |
| Landskassans partur ..... | | 40.342 | 43.762 | 45.241 |

*ad 103127 Læraralønir*
Lønirnar eru settar í tí lønarlagi, sum var galdandi 1. juli 1982. Í skúlaárinum 1982/83 eru 8.120 næmingar í fólkaskúlanum, og lisnir verða umleið 15.400 læraratímar um vikuna; hetta svarar til umt. 16.760 lønartímar. Í 1981/82 vóru 8.120 næmingar, og lisnir vórðu uml. 14.600 læraratímar um vikuna; hetta svarar til uml. 16.600 lønartímar. Roknað verður bert við einum lítlum vøkstri í næmingatalinum og eini broyting í býtinum av næmingum í teimum ymisku árgangunum við fleiri í teimum eldru árgangunum og færri í teimum yngru. Hetta

kann bera í sær eina lítla øking av lisnum vikutímum í 1982/83.

Hendan konto fevnir — umframt um tær veruligu lønarútreiðslurnar til lærarar — somuleiðis um vikarútreiðslur bæði til skipað og ikki sett størv og til ikki-sett størv og útreiðslur í sambandi við skeiðuppihald ella sjúku hjá lærarum. Av hesi konto verður somuleiðis flutningssamsýning o.s.fr. goldið í sambandi við starvssetan læraranna. Lønarútreiðslur til tey starvsfólk, sum arbeiða í fiskiskúlafyrisitingini, deild fyri fólkaskúlan v.m., og sum hava eina pedagogiska útbúgving, verða eisini goldnar av hesi konto.

Roknað verður við at upphæddin fyri [illegible] ella 92.761.140 kr.

| | | |
|---|---|---|
| R | 81/82: | 83.800.000 |
| J | 82/83: | 86.000.000 |
| U | 83/84: | 92.761.000 |

Sostatt er hendla konto [illegible]

Av tí samlaðu upphæddini, 92.761.000 kr., [illegible] ella 51.019 mió. kr.

Landskassans útreiðslur hvørt [illegible]

| | | |
|---|---|---|
| R | 81/82: | 37.771 |
| J | 82/83: | 38.700 |
| U | 83/84: | 41.734 |

*Hin 10365 Fyrisitingin*

[illegible] tkki latið við [illegible]

Roknað verður við stoðli í [illegible] 5% fyri apríl tegulering og [illegible]

Samlaðar útreiðslur fyri fíggjarárið 1983-84 verða [illegible] til 7.650 mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| R | 81/82: | 6.606 |
| J | 82/83: | 7.500 |
| U | 83/84: | 7.650 |

Av hesum útreiðslum skal ríkiskassin gjalda 80%. Landskassans partur verður sostatt:

| | | |
|---|---|---|
| R | 81/82: | 1.321 |
| J | 82/83: | 1.500 |
| U | 83/84: | 1.530 |

*ad 253069 Skúlabarnaflutningur*
Tað er oftast sera ymist, nær tær ymsu kommunurnar senda inn endurgjaldskrav fyri skúlabarnaflutning.

Sostatt eru roknskapartølini ikki avgjørt álítandi.

Uppskotið verður grundað á roknskapartølini fyri 1981/82 + 5% hækking.

| | | |
|---|---|---|
| R | 81/82: | 5.265 |
| J | 82/83: | 7.500 |
| U | 82/83: | 7.875 |

Tær samlaðu útreiðslurnar verða býttar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ríkiskassin | 25% |
| Kommunurnar | 50% |
| Landskassin | 25% |

Landskassans partur er:

| | | |
|---|---|---|
| R | 81/82: | 1.316 |
| J | 82/83: | 1.875 |
| U | 83/84: | 1.969 |

**Studentaskúlar og HF-skeið**

**Almennar viðmerkingar**
Í hesum fíggjarlógaruppskoti fevnir rakstrarstað 14169 um HF-deildina í Klaksvík og 14174 um Studentaskúlan í Eystnoy.

Til komandi skúlaár, 1983/84, verður roynt at seta fleiri lærarar í starv, um so er, at kvalifiseraðir lærarar eru at fáa fatan á. Roynt verður, at mest møguligir tímar verða lisnir sum vanligir tímar, men vegna tørvin á kvalifiseraðum lærarum og faksamanseting, kann neyvan sleppast undan yvirtímum. Eisini eigur at verða havt í huga, at sam

bært burðartølini kann væntast, at næmingatalið ikki fer at vaksa eins skjótt tey komandi árini, sum tað hevur tey seinastu. Av hesi orsøk er ikki ráðiligt at seta ov nógvar lærarar í starv nú.

Í sambandi við studentaskúlarnar og HF-skeiðini eru nakrir prinsippiellir spurningar, sum verða at taka støðu til, nevniliga um hvørjar reglur skulu galda fyri studningsveitan til tey lesandi. Sum er, verður studningur veittur til næmingarnar í Suðuroy, soleiðis at summir fáa koststudning, meðan onnur fáa studning til flutning.

Landsskúlaráðið hevur góðkent, at næmingarnir í Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy fáa flutningsstudning, sum svarar til helvtina av flutningskostnaðinum. Ynskiligt er, at eins reglur koma at galda fyri allar næmingar, soleiðis at næmingar, sum hava fyri neyðini antin at koyra burtur úr bygd til og frá skúla ella at búgva heimanífrá, fyri at ganga í skúla, fáa somu sønudir. T.d. kann hugsast, at veittur verður studningur, sum er fastur prosentpartur av, hvat vanligar flutnings- ella bústaðarútreiðslur eru. Tey, sum koyra dagliga, kunnu kanska fáa 50% av flutningsútreiðslunum sum studning. Eisini skal í hesum sambandi havast í huga, at næmingarnir, sum ganga á HF-skeiðinum í Suðuroy, fáa skúlabøkurnar ókeypis frá skúlanum. Avgjørt eigur at verða, um allir aðrir næmingar við studentaskúlar og HF-skeið eisini skulu njóta henda fyrimun.

**Fíggjaruppskot fyri rakstrarstað nr. 14155 HF-skeiðið í Suðuroy fíggjarárið 1983/84**

| Kouto | | Roknskapur 1981/82 kr. | Játtan 1982/83 1000 kr. | Uppskot stovnsins 1983/84 1000 kr. | Uppskot landsstýrisins 1983/84 í 1000 kr. | Ætlan 1984/85 í 1.000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | 0,00 | ÷7.0 | ÷ 7.0 | ÷7.0 | ÷7.0 | ÷7.0 |
| 103168 | Løn - sáttmálalønt | 759554,63 | 759.7 | 908.6 | 908.6 | 908.6 | 908.6 |
| 103222 | Løn - reingerð | 49833,71 | 38.5 | 53.0 | 53.0 | 53.0 | 53.0 |
| 103288 | Løn - onnur | 187,00 | 4.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 103296 | Tímaløn | 568832,07 | 595.6 | 605.7 | 605.7 | 605.7 | 605.7 |
| 103405 | Úrtíðarløn | 558389,58 | 540.2 | 525.5 | 525.1 | 525.1 | 525.1 |
| 103509 | Samsýningar | 5093,78 | 13.0 | 13.0 | 13.0 | 13.0 | 13.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 235347,25 | 197.0 | 255.0 | 255.0 | 255.0 | 255.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 14877,89 | 22.0 | 24.0 | 24.0 | 24.0 | 24.0 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 0,00 | 1.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 509,50 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 39400,00 | 69.0 | 75.6 | 75.6 | 75.6 | 75.6 |
| 233051 | Innbúgv | 20562,00 | 25.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233155 | Prentlutir | 8121,30 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15,0 | 15,0 |
| 233259 | Postgjald | 290,10 | 2.0 | 2.7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 |
| 233354 | Telefon og telex | 7821,00 | 12.0 | 15.0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 37314,42 | 40.0 | 40.0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur .. | 861,50 | 1.0 | 1.3 | 1,3 | 1,3 | 1,3 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 8985,60 | 17.0 | 17.0 | 17,0 | 17,0 | 17,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding .... | 18449,37 | 40.0 | 40.0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 253093 | Søvnini ..... | 28753,72 | 30.0 | 25.0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| 253148 | Kost og logi ..... | 529,00 | 15.0 | 15.0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 7441,20 | 6.0 | 9.0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| **14155** | | **2371254,12** | **2437.0** | **2.665.4** | **2.665,0** | **2.665,0** | **2.665,0** |

Fíggjaruppskot fyri rakstrarstað nr. 14155 HF-skeiðið í Suðuroy, fíggjarárið 83/84.

**Frágreiðing:**

*ad. 10322 Løn reingerð*

Hækl[illegible] er [illegible] av prístalin[illegible], [illegible] at HF hevur fingið eina [illegible]

[illegible] 5.(KK) - kr.
[illegible] 5.(KK) -
[illegible] -
[illegible] -

[illegible] av

[illegible] 2.(KK) - kr.
[illegible] 4.(KK) -
[illegible] 1.(KK) -

[illegible] 5.(KK) - -

[illegible] leigumntøkur til 7.(KK), kr

*ad 253903 Aðrar útreiðslur*

| | |
|---|---|
| 1) Samsýning fyri flutning til 2 lærarar . . . . . | 6.000,- kr. |
| 2) Felagstiltøk o.l. . . . . | 3.000,- — |
| **samanlagt** | **9.000,- —** |

Næmingatalið fyri 83/84 væntast at verða umleið tað sama sum í 82/83, ímeðan næmingatalið fyri 84/85 og 85/86 væntast at hækka við umleið 10 næmingum.

Viðvíkjandi uppskotum fyri 84/85 og 85/86 væntast allir postar at hækka við prístalinum, um broytingar ikki verða gjørdar frá politiskari síðu, so sum samanlegging av skeiðinum, sum hevði ført við sær lækking av tølunum av tilvalsflokkunum í 2 HF.

Suðuroyar HF-skeið
3880 Tvøroyri
Føroyar

Poul Erik Smedemark
deildarleiðari

*ad. 103168 Løn/sáttmálaløn.*
Bruttolønir pr. 1/9 1982 (fastar lønir).
Adjunktar (7), kr. 757.140. Roknað verður við 13,5% prístalshækking pr. 1/4 1983 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84, harafturat 1,5% frítíðarløn. Tilsamans **kr. 908.568.**

Sí annars skjal 1.

*ad. 103296 Tímaløn*
Lønir pr. 1/9 1982. Tímalærarar (8) kr. 504.720. Roknað verður við 13,5% prístalsvøkstur pr. 1/4 1983 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84, harumframt 1,5% frítíðarløn. — Tímaløni tilsamans **kr. 605.664.**

Sí annars skjal 1.

*ad. 103405 Úrtíðarløni*
Kr. 443.436. — Roknað verður við 13,5% prístalsvøkstur pr. 1/4 1983 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84. — Tilsamans **kr. 525.472.**

Sí annars skjal 1.

**Suðuroyar HF:**

| | Føst løn | Yvirtíð | Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10% |
|---|---|---|---|
| Adjunktur ... | 171.156 kr. | 181.428 kr. | 17.116 kr. |
| — ... | 137.796 — | 43.092 — | 13.800 — |
| — ... | 137.796 — | 26.700 — | 13.800 — |
| — ... | 110.964 — | 87.588 — | 11.096 — |
| — ... | 50.100 — | 19.440 — | 5.010 — |
| — ... | 93.336 — | 70.548 — | 9.334 — |
| — ... | 55.992 — | 14.630 — | 5.599 — |
| **Tilsamans** | **757.140 kr.** | **443.436 kr.** | |

| | | |
|---|---|---|
| Tímalærari .. | | 10.488 kr. |
| — .. | | 57.192 — |
| — .. | | 137.616 — |
| — .. | | 20.964 — |
| — .. | | 158.568 — |
| — .. | | 47.184 — |
| — .. | | 51.276 — |
| — .. | | 21.432 — |
| **Tilsamans** | | **504.720 kr.** |

Viðv. hækkingum, sí viðm. til konti 103168, 103296, 103405.

**Fíggjaruppskotið fyri 1983/84 og ætlan fyri 1984/85 og 1985/86.**
**Rakstrarstað nr. 14155 Suðuroyar HF-skeið.**

| Konto | | Uppskot 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | -:-7.0 | -:-7.0 | -:-7.0 |
| 103168 | Løn sáttmálalønt | 908.6 | 908.6 | 908.6 |
| 103222 | Løn/reingerð | 53.0 | 53.0 | 53.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 103296 | Tímaløn | 605.7 | 605.7 | 605.7 |
| 103405 | Útíðarlønir | 525.5 | 525.5 | 525.5 |
| 103509 | Samsýningar | 13.0 | 13.0 | 13.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanlands | 255.0 | 255.0 | 255.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanlands | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 24.0 | 24.0 | 24.0 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 1.0 | 1.0 | 1.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 75.6 | 75.6 | 75.6 |
| 233051 | Innbúgv | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233155 | Prentlutir | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 233259 | Postgjald | 2.7 | 2.7 | 2.7 |
| 233354 | Telefon og telex | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 1.3 | 1.3 | 1.3 |
| 253077 | Ekskursiónir | 17.0 | 17.0 | 17.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 253093 | Søvnini | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 253148 | Kost og logi | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 9.0 | 9.0 | 9.0 |
| **14155** | | 2.665.4 | 2.665.4 | 2.665.4 |

Við sama fyrivarni sum nevnt undir Høvuðsteinum [illegible] lønarhækkingum í 1984/85 og 1985/86 eru talsins [illegible] sett til tað sama sum fyri 1983/84.

**Fíggjaruppskot fyri árið 1983/84 hjá Studentaskúlanum og HF-skeiði í Eysturoy**

| Konto | | Gøta rakstrar-stað 14174 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Klaksvík rakstrar-stað 14169 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Samanlagt uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins samanlagt 1983/84 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | 0.0 | 0.0 | ? | | | |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn | 3.488.0 | 3.488,0 | 1.046.0 | 1.046.0 | 4.534.0 | 4.534,0 |
| 000000 | Løn/starvsfólk | 291.0 | 291,0 | 0.0 | 0,0 | 291.0 | 291,0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 292.9 | 293,0 | 70.0 | 70.0 | 362.9 | 363,0 |
| 103288 | Løn/onnur | 10.0 | 10.0 | 15.0 | 15.0 | 25.0 | 25,0 |
| 103296 | Tímaløn | 679.0 | 679,0 | 180.0 | 180.0 | 859.0 | 859,0 |
| 103405 | Úrtíðarløn | 901.0 | 901,0 | 270.0 | 270.0 | 1.171.0 | 1.171,0 |
| 103509 | Samsýningar | 39.0 | 39,0 | 42.0 | 42,0 | 81.0 | 81,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpening. innanlands | 763.0 | 763,0 | 193.0 | 193,0 | 956.0 | 956,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 120.0 | 120,0 | 70.0 | 70,0 | 190.0 | 190,0 |
| 213408 | Umvælingar av verandi hølum | 139.0 | 139,0 | 80.0 | 80,0 | 219.0 | 219,0 |
| 213702 | Ognartrygging | 20.0 | 20,0 | 5.0 | 5,0 | 25.0 | 25,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 165.0 | 165,0 | 22.4 | 22,5 | 187.4 | 187,5 |
| 233051 | Innbúgv | 282.0 | 282,0 | 80.0 | 53,0 | 362.0 | 335,0 |
| 233155 | Prentlutir | 88.0 | 88,0 | 25.0 | 25,0 | 113.0 | 113,0 |
| 233259 | Postgjald | 6.0 | 6,0 | 2.5 | 2,5 | 8.5 | 8,5 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233354 | Telefon og telex ..... | 23.0 | 23,0 | 12.0 | 12,0 | 35.0 | 35,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 85.0 | 85,0 | 50.0 | 50,0 | 135.0 | 135,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur ..... | 35.0 | 35,0 | 20.0 | 20,0 | 55.0 | 55,0 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 30.0 | 30,0 | 16.0 | 16,0 | 46.0 | 46,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding ..... | 223.0 | 223,0 | 100.0 | 75,0 | 323.0 | 298,0 |
| 253093 | Søvnini ..... | 286.0 | 286,0 | 179.0 | 129,0 | 465.0 | 415,0 |
| 253148 | Kost og logi ..... | 60.0 | 60,0 | 8.0 | 8,0 | 68.0 | 68,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 84.0 | 84,0 | 30.0 | 30,0 | 114.0 | 114,0 |
| | | **8.109.9** | **8.110,0** | **2.515.9** | **2.414,0** | **10.625.8** | **10.524,0** |

*ad 103168 Løn/sáttmálaløn*
Samlaður tørvur á rakstrarstaði **14174** og **14169**

Vit meta, at 4 nýggir klassar koma afturat komandi ár, sum svarar til $\frac{33 \times 4}{22} = 6$ størv.

Vegna *greinvalið, HF-valfakini og ferðareduktión* rokna vit (1,5 + 1 + 0,5) størv. Tilsamans **9 størv.**

Tá vit ikki kenna útfallið av greinvali og valfakunum á HF, skal talið takast við fyrivarni.

9 størv á 12.000 kr. pr. mánað svarar til 9 × 12.000 × 12 = 1.296 tús. pr. ár.

Sáttmálaløn verða sostatt:

957 (játtan) + 1.690 (eykajáttan) + 1.296 tús. = 3.943 tús. + 15% vegna prístal og frítíðarløn = 4.534 tús.

Deilt upp eftir forventaðu tímatølunum á rakstrarstøðunum verður:

1) Gøta: **3.488 tús.**
2) Klaksvík: **1.046 tús.**

*ad 00 Løn/starvsfólk:*

1) Skrivstovukvinna skúlans (kr. 131.160 fyri fullan dag).
   + 10% prístal + 1,5% frítíðarløn = *146.0 tús.*
2) Skúlatænari (1/2 dag 65.000 kr. × 2)
   + 10% prístal + 1,5% frítíðarløn = *145 tús.*

**Pkt. 1 og 2 tilsamans: 291 tús.**

*ad 103222 Løn/reingerð:*

Tvey hálvdags reingerðingsfólk *130.0 tús.*

1) + eina eyka vaskikonu til tær 3-4 nýggju stovurnar, sum koma afturat komandi skúlaár: (130 + 65 = 195 tús.)
   + 10% prístal + 1,5% frítíðarløn = *217.4 tús.*
2) Kantinuhjálp o.a.: 4 tímar = 65.000 kr.
   + 10% prístal + 1,5% frítíðarløn = *75.5 tús.*

**Pkt. 1 og 2 tilsamans: 292.9 tús.**

*ad 103288 Løn/onnur:*

Fyrifallandi arbeiði, sum millum annað næmingar gera, so sum: bókasavn, arkivering, reinskriving av tímatalvum o.s.v. *kr. 10 tús.*

*ad 103296 Tímaløn:*
Tímalærarar, 14 í tali, kosta 716 tús. + (13,5% + 5% = prístal + sáttmálahækking + frítíð) = 859 tús. tilsamans í Klaksvík og Gøtu. Deilt eftir tímatalinum pr. 1 september gevur tað
Gøta: *679 tús.*
Klaksvík: *180 tús.*

*ad 103405 Úrtíðarløntir:*
708 tús. + 13,5% í 1982/83 + 5% í 1983/84 geva *843 tús.*
Teir lærarar, sum krevjast eyka vegna 4 nýggjar klassar — nevndir á konto 103168 — vilja pr. erfaring hava umleið 4 yvirtímar í meðal, t.v.s. úrtíðarløntir krevja $4 \times 9 \times 760'2 = 328$ tús. afturat. Sostatt tilsamans: $843 + 328 = 1.171$ tús., sum deilt eftir flokkunum komandi ár gevur:
Gøta: *901 tús.*
Klaksvík: *270 tús.*

*ad 103509 Samsýningar:*
1) Felagstímar (max. 10) fyri allar skúlaflokkar, har fólk halda fyrilestrar av almennum áhuga ($600 \times 10$) = **6.000 kr.**
2) Umsjónin við teim skrivligu prógtøkunum: Vit rokna við 25 skrivligum prógtøkum (íroknað sjúkra- og endurroyndir) við 3 føstum vaktum í 6 1/2 tíma pr. dag. Hetta gevur $25 \times 3 \times 6\ 1/2 \times 62 =$ **30 tús.**
3) annað: gardinseyming, smáørindi til handils, posthús o.s.v. *3.000 kr.*
1) + 2) + 3) = **39 tús.** (Gøta).

*ad 113202 Ferða- og dagpening, innanlanda:*
1) Flutningur av *næmingum:* 1 1982/83 kostaði eystari armur á Skálafjørðinum 110 tús., vestari armur + Oyndarfjørður 160 tús. og Fuglafjørður + Lorvík (Klaksvík) 115 tús. Tilsamans *385 tús.* Tað kann roknast við eini rutu frá Streyminum til Gøtugjógv, t.v.s. 100 tús. komandi skúlaár. Koyripengar til næmingar, har eingin bussruta fínst, er ikki lætt at meta um, men um 25 næmingar búgva í meðal 25 km frá bussnetinum, er hetta í dagsprísum **212 tús.**
Inntøkan av billettsølu fer at liggja um $90 \times 40 \times 5 \times 10 =$ *180 tús.*
Næmingaflutningur tørvar sostatt:
385 tús. + 100 tús. + 212 tús. − 180 tús. = 517 tús. + 10% prístal = **569 tús.**
2) Flutningur av lærarum: talið av ferðum í ár er 32 pr. viku og kann væntast at verða 44 komandi ár. Tað gevur $200 \times 40 \times 44$ 352 tús.

+ 10% = *387 tús.*
pkt. 1 + 2 = **956 tús.**

Deilt út á rakstrarstøðini:
Gøta: 569 + 0,5 × 387 = **763 tús.**
Klaksvík: 0,5 × 387 = **193 tús.**

Havast skal í huga, at henda kontoin kann reduserast munandi, um tær ætlaðu bussruturnar, sum Samferðslunevndin hevsar um, verða settar á stovn. Vit vildu eisini meta tað verið meiri hóskiligt, at transportproblemini sorteraðu undir Strandferðslustovninum heldur enn Studentaskúlanum. Um hetta ikki er gjørligt, vildu vit ynskt »flutning av næmingunum« settan á eina konto fyri seg, atskildan frá lærararferðing.

*ad 213105 El, hiti og vask:*
Talið á lampustøðum er tvífaldað og viðlíkahaldið av ljósstoffrørum tí økt munandi. Talið av rúmum, sum krevja upphiting, er økt (elsti skúlin komin afturat), og tí økist el-nýtslan munandi (elsti skúliu er **bert** upphitaður við el-ovnum). Hækking í el- og oljuprísum saman við øktari nýtslu av vaskievnum og amboðum (klútar, spannir, vaskivognar, skrubbur v.m.) ger, at vit skjóta upp **120 tús.** við øllum teinkjandi fyrivarni. Meðan hetta verður skrivað, vita vit einki um ætlanir Landsstýrisins viðvíkjandi hølispurninginum komandi skúlaár.
Gøta: **120 tús.**

*ad 213408 Umvælingar av verandi hølum:*
A) Viðlíkahald av skúlanum innan: Her verður hugsað um trappurnar av miðhæddini upp á loft, sum eru í ógvuliga ringum standi. Tær eru tann mest »trafikkeraða« leiðin á skúlanum (til og frá 2 skúlastovum), kantinuni og kontórinum). **20.000 kr.**
b) elsti skúli krevur avgjørt til at málast/tapetserast á loftinum og í eystaru stovuni í neðra. **20.000 kr.**
c) Kemi/biologi-stovan í 1929-bygningimum hevur onga útsúgving fingið, t.v.s. einki stinkskáp (tað er ópraktiskt og óforsvarligt at hava vindeygu og hurðar opin, hvørja ferð ein arbeiðir við kloir, ammoniakk etc.). Hetta er annars eitt *krav* frá heilsumyndugleikunum til allar studentaskúlar í Danmark av trygdargrundum. **60.000 kr.**
d) Nýtt linolium í tveimum stovum er neyðugt. **20.000 kr.**
e) Umbyggjan av skúlastovu, so hon eisini kann brúkast sum tónleikahøli (ljóðdoyving): **19.000 kr.**

a + b + c + d + e = tilsamans **139.000 kr.** (Gøta)

*ad 213702 Ognartrygging:*
Ognartrygging, vanlukkutrygging av lærarum, pedelli, vaskikonum og næmingum í arbeiðstíð, ábyrgdartrygging, trygging av bókasavni verður mett til **20 tús.** (Gøta).

*ad 213806 Leiguútreiðslur:*
1) Leiga av Losjuni í Gøtu til prógtøkur: *5.000 kr.*
2) Leiga av skúlanum frá Gøtu kommunu: *160.000 kr.*
1) + 2) = **165 tús.** (Gøta)

*ad 233051 Innbúgv:*

| | |
|---|---|
| Talvur til 4 klassar | 50.000 kr. |
| Borð + stólar til 4 klassar | 150.000 — |
| Køliskáp til kantinuna | 5.000 — |
| Gardinur | 10.000 — |
| Stólar/borð til lærarastovuna | 14.000 — |
| Lørift til overhead-projektor (O.H.P.) | 10.000 — |
| Innan- og uttandura ruskstativ | 4.000 — |
| Uppslagstalvur til tey ymisku fakini | 3.000 — |
| Postsmogusystem til lærarar | 2.000 — |
| Brandsikrað box til eksamensuppgávur | 13.000 — |
| Reolir og arkivskáp | 15.000 — |
| Ymiskt: (pengakassi, stólar á gongini v.m.) | 6.000 — |
| **(Gøta) tilsamans** | **282 tús. —** |

*ad 233155 Prentlutir:*
1) pappír: til prógtøkur, til fotokopiering, til dataundirvising *75.000 kr.*
2) sverta til Rank Xerox, film til O.H.P., spiralheftari og el-høn. *13.000 kr.*
1) + 2) = **88 tús.** (Gøta)

*ad 233259 Postgjald:*
Gøta **6.000 kr.**

*ad 23354 Telefon og telex:*
Rakstur av verandi apparatum *15.000 kr.*

Etablering av mynttelefon til næmingar og lærarar *4.000 kr.*
Eykaapparat + eina eyka linju *4.000 kr.*
Gøta **23.000 kr.**

*ad 233409 Leiga av maskinum:*
Skúlin treingir harðliga til egna kopieringsmaskinu í staðin fyri ta lítlu, sum vit leiga frá Gøtu kommunu. Henda nøktar langt frá tørvin, og Gøtu kommuna ynskir ikki at halda fram við at leiga okkum maskinuna.

Játtanin í 1982/83 uppá 70.000 kr. til 6 flokkar og roknskapur 81/82 vísir 34.277 kr. baserað uppá 5 flokkar ger, at vit meta tørvin til 85.000 kr.
**Gøta tilsamans: 85.000 kr.**

*ad 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur:*
Supplering av MODULEX *3.000 kr.*, minikopimaskina *13.000 kr.*, arkiveringsútgerð (samlimappur, brævordnarar v.m.) *2.000 kr.*
Eksaminsprotokollir, hondbøkur, pappírformularar *6.000 kr.*
Skrivimaskina: *8.000 kr.*
Smærri ting: hønur, holarar, brævvekt, skriviamboð v.m. *3.000 kr.*
Tilsamans **35 tús.** (Gøta)

*ad 253077 Ekskursiónir:*
10 klassar á 3.000 kr. = **30 tús.**

*ad 253085 Bókakeyp og innbinding:*
Vit meta, at hvørjum faki nýtist 8.000 kr., og sostatt verður upphæddin $19 \times 8000 = 152$ *tús.*

Føroysk og útlendsk tíðarrit, bøkur um lestrarvegleiðing, »erhvervskartotek«, leksikon: *40 tús.*

Orðabøkur til prógvtøkur:

| | sløg | × | nævn. | × | pris. | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| enskt ..... | 3 | × | 30 | × | 100 | = | 9.000 kr. |
| danskt ..... | 2 | × | 30 | × | 100 | = | 6.000 kr. |
| føroyskt ..... | 3 | × | 30 | × | 225 | = | 13.500 kr. |
| týskt ..... | 2 | × | 15 | × | 100 | = | 3.000 kr. |

Viðmerking: Studentarnir partvíst annað pensum enn HF-flokkarnir tað finst einki bókasavn í Eysturoy, økt nærningatal, summar føroyskar bøkur fáast bert fyri antikvitetspris.
**Gøta tilsamans: 223 túsund.**

*ad 253093 Søvnini:*
Við tað at filmleverandørar leggja um til video, og vit eiga hvørki: *25 túsund.* til U-matic apparat. Bond *5 túsund.* Roknimaskinur *15 túsund.* Miniature-útgáva av gomlum føroyskum amboðum til føroyskt og søgu *10 túsund.*. Episkop ella ljósmyndatól *5 túsund.* Guitar til musikundirv. *2 túsund.*. Máliborðsbløð og kortsamling til geografi *10 túsund.*. Ítróttaramboð *8 túsund.*.

Biologi/fiskivinnu-amboð: Ph-metur, centrifuga, gløs, kemikaliir, præparat og mikroskop *43 túsund.*

Fysik-amboð: henda útgerð er sera kostnaðarmikil, men ein avgjørd treyt fyri at halda frálæruni á tí støði, sum krevst: kaloriumetur 20 stk., temp.følarar, »Wheatstones«-brúgv, voltmetur, amperemetur, ohmmetur, impulsteljarar, rotatiónsmotor, oscilloskop, magnetir, sinusgenerator v.m. *126 túsund.*

Kemi-amboð: tvær vektir, kemikaliir, gløs, spektrofotometur v.m. *37 túsund.*

**Samanlagt í Gøtu: 286 túsund.**

*ad 253148 Kost og logi*
Møguleiki er fyri at avbygdanæmingar (úr t.d. Norðoyggjum) yvirskja at flyta til Sjómansheim ella líknandi og tessvegna mugu fáa sømdir ájavnt við kostnæmingar í Høydølum.

Vit meta: **60 túsund.** (Gøta)

*ad 253903 Aðrar útreiðslur:*
Við tað at nógv ymiskt, ið ikki kann setast undir hinar kontornar, óvæntað má rindast av onkrari konto, er vert at nevna nøkur ting;

sum eru nøkulunda fastar útreiðslur: krit 5.000 kr., lýsingar 6.000 kr., ársrit 14.000 kr., stuðul til næmingaarbeiði í næmingafelagnum 3.000 kr., flytiútreiðslur hjá nýggjum lærarum 35.000 kr., umboðan 3.000 kr., evnisvika 8.000 kr., amboð til pedellin (stiga, borimaskinu v.m.) 10.000 kr.

Tilsamans **84 tús.** (Gøta)

**Viðmerking:**
Økingin í næmingatalinum komandi skúlaár er ein faktorur, sum í ein ávísan mun *er* inkalkuleraður í hjálagda fíggjaruppskoti, t.d. lærara-tørvur, skúlaborð, stólar, talvur o.s.v., meðan sjálvur *hølispurningurin* als ikki er tikin við í vurderingarnar vegna tørvandi politiskt útspæl um henda spurning.

Teir gomlu skúlarnir (1929 og 1887) við Gøtugjógv eru aftan á umbyggingina í ár (1982) avgjørt maximalt útnyttaðir, og nýtslan av fólkaskúlanum við Gøtugjógv kann ikki troytast meir uttan at nerva barnaskúlan meir, enn gott er.

Tørvurin er minimum 4 skúlastovur og helst tvey-trý smærri høli vegna *greinvalið* og HF-*valfakini*. Annars kann nevnast, at vit á Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Lysturoy kenna einki til hølir sum rúm til lærarastovu, bókasavn, lestrarvegleiðing, inspektor, pedell, vaskirúm, goymslurúm o.s.v., sum annars finst á øllum øðrum skúlum her á landi — stutt sagt ótolandi umstøður. Nokk um hetta á hesum sinni.

Tá tílíkar avgerandi fortreytir í løtuni eru okkum ókendar, má fíggjaruppskotið sjálvandi metast við hesum — tí óloysta hølis-spurninginum — í huga.

## Rakstrarstað uummar 14169, Klaksvíkar HF-skeið

| Roknskapur Konto | Tekst | 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 |
|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | ÷1.400,00 | 0,00 | ? | |
| 203168 | Løn/sáttmála | 912.287,61 | 957.200,00 | | |
| 203222 | Løn/reingerð | 119.813,25 | 130.000,00 | 70.000,00 | 70.000 |
| 203288 | Løn/onnur | 8.213,44 | 14.000,00 | 15.000,00 | 15.000 |
| 203296 | Tímaløn | 643.361,08 | 716.200,00 | | |
| 203405 | Úrtíðarløni r | 655.781,18 | 708.100,00 | | |
| 203509 | Samsýningar | 11.979,21 | 23.200,00 | 42.000,00 | 42.000 |
| 213202 | Ferða- og dagpeningur | 270.197,32 | 416.000,00 | | |
| 213105 | El/hiti/vask | 96.977,15 | 100.000,00 | 70.000,00 | 70.000 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 26.100,92 | 100.000,00 | 80.000,00 | 80.000 |
| 213702 | Ognartrygging | 1.464,00 | 4.800,00 | 5.000,00 | 5.000 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 92.515,00 | 30.000,00 | 22.400,00 | 22.400 |
| 233051 | Innbúgv | 40.511,05 | 70.000,00 | 80.000,00 | 80.000 |
| 233155 | Prentlutir | 15.464,11 | 50.000,00 | 25.000,00 | 25.000 |
| 233259 | Postgjald | 885,00 | 3.500,00 | 2.500,00 | 2.500 |
| 233354 | Telefon og telex | 8.613,30 | 20.000,00 | 12.000,00 | 12.000 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 34.277,60 | 70.000,00 | 50.000,00 | 50.000 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 8.719,65 | 16.000,00 | 20.000,00 | 20.000 |
| 253077 | Ekskursiónir | 4.200,00 | 18.000,00 | 16.000,00 | 16.000 |
| 253035 | Bókakeyp og innbinding | 61.514,61 | 120.000,00 | 100.000,00 | 100.000 |
| 253093 | Søvnini | 118.653,98 | 199.000,00 | 179.000,00 | 179.000 |
| 253148 | Kost og logi | 14.100,00 | 8.000,00 | 8.000,00 | 8.000 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 13.153,90 | (119.000,00) | 30.000,00 | 30.000 |
| | | (Feilur hjá Føroya Gjaldstovu) | | | |

**Rakstrarstað nummar 14169, Klaksvíkar HF-skeið**

**Frágreiðing til fíggjarætlan fyri 1983/84:**
1981/82: 5 flokkar í Klaksvík og Gøtu
1982/83: Játtan søkt til 6 flokkar í Klaksvík og Gøtu
1983/84: Játtan søkt til 4 flokkar í Klaksvík (Gøta ikki íroknað)

*Ad 103222 Løn/reingerð:*
Løn, Paulina Norðbúð pr. 1/7-82: 5.141,00 kr.
5.141 + 10% prístalsviðbót + 1,5% feriuløn = 5.732,21 kr. mðl.
5.733 × 12 mðr. = 68.796 kr. **Søkt: 70.000,00**

*Ad 103288: Løn/onnur:*
Til pedellarbeiði, smáørindi, smærri umvælingar o.tl. verður roknað við uml. 20 tímum um mánaðin:
20 t. á 62 kr. × 12 mðr. **Søkt: 15.000,00**

*Ad 103509: Samsýningar:*
Til prøvtøkuvakt, incl. reeksamination, 4 flokkar:

| | | |
|---|---|---|
| Summar 83: 6 vaktir 60 tímar á 62 kr.t. ..... | = | 23.000 kr. |
| Aug.-sept. 83: 2 vaktir 24 tímar á 62 kr.t. ..... | = | 3.000 kr. |
| Fyrilestrar: 10 tímar á 600 kr. ..... | = | 6.000 kr. |
| Annað: T.d. sekreterhjálp, gardinseyming, uppvarting á dimmissiónsdegnum ..... | = | 10.000 kr. |
| **Tils. søkt:** | | **42.000 kr.** |

*Ad 213105 El/hiti/vask:*

| | | |
|---|---|---|
| Til elektricitet (2 málarar) roknast við ..... | | 10.000 kr. |
| Til olju (2400 kr. mðl.) — — ..... | | 33.000 kr. |
| Til vask, perur + eyka ljósstoffarmatur incl. umvæling av lampum ..... | | 27.000 kr. |
| **Tils. søkt:** | | **70.000 kr.** |

P.S. innrætting av einum eyka høli krevur 10 ljósstoffarmatur.

*Ad. 213408: Umvælingar v.m.*

| | |
|---|---|
| Umvæling av HF-húsinum uttan (takið leikur), tak, vindeygu v.m.: ..... | 50.000 kr. |
| Umvæling og innrætting av einum eyka høli (roknað verður við 4 flokkum komandi ár mótvegis (3 flokkar nú) incl. flyting av veggi: ..... | 30.000 kr. |
| **Tils. søkt:** | **80.000 kr.** |

*Ad 213806: Leiguútreiðslur:*

| | |
|---|---|
| Leiga av hølum til prógtøkur (HF-húsið hevur ikki nóg rúmlig hølir): 3 hølir 8 dagar á 600 kr..... = | 14.400,00 kr. |
| Leiga av K.Í.høllini til fimleik ..... = | 8.000,00 kr. |
| **tils.** | **22.400,00 kr.** |

*Ad. 233051: Innbúgv*

| | |
|---|---|
| 25 borð og stólar til ein eyka flokk ..... | 25.000,00 kr. |
| 30 prógtøkuborð á ca. 900 kr. ..... | 27.000,00 kr. |
| 2 talvur á 2500 kr. ..... | 5.000,00 kr. |
| 1 læraraborð ..... | 2.000,00 kr. |
| 1 uppslagstalva ..... | 1.000,00 kr. |
| 1 skjótihurð ..... | 8.000,00 kr. |
| 1 kartoteksskáp ..... | 5.000,00 kr. |
| reolir ..... | 7.000,00 kr. |
| **tils.** | **80.000,00 kr.** |

Prógtøkuborð kunnu sláast saman við flyting til eksaminshølir.

*Ad. 233561: Skrivstovuútreiðslur:*

| | |
|---|---|
| Tørvur er fyri eini nýggjari skrivimaskinu o.a. útgerð til vaksandi bókhald, m.a. arkivering av skjølum: | **20.000 kr.** |

*Ad. 253077: Ekskursiónir:*

| | |
|---|---|
| Roknað verður við 3.000 kr. pr. flokk, 4 flokkar: | **12.000 kr.** |

*Að 253085: Bókakeyp og innbinding:*

| | | |
|---|---|---|
| Til viðlíkahald og endurnýggjan av bókasøvnum fyri uml. 20 fak, innroknað hald av bløðum og tíðarritum til undirvísingarendamál: 5.000 kr. pr. fak ..... | = | **100.000 kr.** |

*Að 254903: Aðrar útreiðslur:*

| | |
|---|---|
| Prógtøkupappír, krit o.l. ..... | 5.000 kr. |
| Lýsingar ..... | 2.000 kr. |
| Vørur til kaffi á dimissiónsdegi o.tl. ..... | 2.000 kr. |
| Verktoy, stiga o.tl. ..... | 5.000 kr. |
| Flytiútreiðslur til 2 lærarar ..... | 10.000 kr. |
| Annað óforútsæð ..... | 6.000 kr. |
| **Tils.** | **30.000 kr.** |

*Að 253093 Søvn*

Til viðlíkahald og endurnýggjan av søvnum:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Landalæra (kort og dias-seria) ..... | | | 22.000 kr. |
| Tónleik (plátur og ljóðbond) ..... | | | 2.000 kr. |
| Søga (dias og ljóðbond) ..... | | | 2.000 kr. |
| Mál og onnur fak: Leiga av filmum ..... | | | 3.000 kr. |
| Overhead-projektor ..... | | | 10.000 kr. |
| Video-apparat v. film..... | | | 35.000 kr. |
| 2 bandupptakarar ..... | | | 10.000 kr. |
| Fiskivinna (ymisk tól til kanningar) ..... | | | 5.000 kr. |
| *Biologi:* Glasvørur og kemisk evnir ..... | 4.000 | | |
| 2 PH-metur ..... | 4.000 | | |
| 1 salinometur ..... | 3.000 | | |
| 1 centrifuga ..... | 4.000 | | |
| ymisk præparat ..... | 3.000 | | |
| 4 mikroskop ..... | 6.000 | | |
| 5 stoppur ..... | 1.000 | | |
| | tils. | | 25.000 kr. |
| Fimleik: Tól til fimleik, t.d. bóltar o.tl. ..... | | | 10.000 kr. |
| Kemi: Kemikaliir, gløs, l vekt o.a. ..... | | | 15.000 kr. |
| Fysikk sambært fylgiskjal (síða 5) ..... | | | 40.000 kr. |
| | | **Tils.** | **179.000 kr.** |

| | |
|---|---|
| Útgerð til *fysikk* í Klaksvík | |
| »Ledningsevne«-málari ..... | 1.500 kr. |
| Millikanútgerð ..... | 12.000 kr. |
| Útgerð hertil 250 kr. | |
| — — 450 kr. | |
| — — 600 kr. | |
| — — 1.200 kr. ..... | 2.500 kr. |
| Digitalteljari, 2 stk. ..... | 8.000 kr. |
| Støjmálari ..... | 2.000 kr. |
| Elektronikksett ..... | 2.000 kr. |
| Plancks konstant, útgerð ..... | 1.500 kr. |
| Hg-lampa ..... | 500 kr. |
| Máliforsterkari ..... | 3.000 kr. |
| Linsur og optik ..... | 3.000 kr. |
| Ymisk laboratoriiútgerð ..... | 4.000 kr. |
| Tilsamans ..... | **40.000 kr.** |

**Rakstrarstað nr. 14205 Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar**
**Fíggjaruppskot fyri 1983/84**

| Konto | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1.000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur ..... | ÷32.630,00 | ÷ 6.0 | ÷25.0 | | | |
| 103048 | Løn/tænastumenn ..... | 873.500,00 | 948.1 | 1.038.1 | 1.038,1 | 1.038,1 | 1.038,1 |
| 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 237.452,77 | 252.4 | 431.7 | 431,7 | 431,7 | 431,7 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt ..... | 5.030.080,28 | 5.625.4 | 7.822.0 | 7.822,0 | 7.822,0 | 7.822,0 |
| 103222 | Løn/reingerð ..... | 500.435,58 | 591.4 | 640.0 | 640,0 | 640,0 | 640,0 |
| 103288 | Løn/onnur ..... | 10.384,88 | 10.0 | 19.0 | 19,0 | 19,0 | 19,0 |
| 103296 | Tímaløn ..... | 766.573,23 | 884.9 | 997.6 | 997,6 | 997,6 | 997,6 |
| 103405 | Úrtíðarlønir .. ..... | 2.512.377,38 | 3.113.6 | 3.332.2 | 3.332,2 | 3.332,2 | 3.332,2 |
| 103509 | Samsýningar ..... | 17.883,19 | 23.0 | 28.0 | 28,0 | 28,0 | 28,0 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. .... | 38.630,35 | 35.0 | 15.0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. .... | 0,00 | 0.0 | 0.0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 419.572,65 | 406.5 | 455.5 | 455,5 | 455,5 | 455,5 |
| 213408 | Umvælingar v.m. ..... | 106.240,25 | 230.0 | 236.4 | 200,0 | 200,0 | 200,0 |
| 213607 | Størri umbyggingar ..... | 476.892,67 | 0.0 | 170.0 | 170,0 | 170,0 | 170,0 |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 17.678,00 | 55.0 | 44.6 | 44,6 | 44,6 | 44,6 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 55.800,00 | 98.9 | 98.0 | 98,0 | 98,0 | 98,0 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 21.547,59 | 81.0 | 146.0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |
| 233155 | Prentlutir ..... | 31.075,79 | 54.0 | 63.5 | 63,5 | 63,5 | 63,5 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233259 | Postgjald ..... | 3.395,21 | 5.0 | 8.0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| 233354 | Telefon og telex ..... | 13.714,40 | 27.0 | 28.0 | 28,0 | 28,0 | 28,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 72.343,08 | 78.0 | 115.0 | 115,0 | 115,0 | 115,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur . | 7.220,80 | 8.0 | 9.0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 12.493,62 | 20.0 | 40.0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding ... | 65.700,14 | 65.0 | 100.0 | 75,0 | 75,0 | 75,0 |
| 253093 | Søvnini ..... | 124.659,32 | 180.0 | 510.9 | 210,8 | 210,8 | 210,8 |
| 253857 | Vøllurin ..... | 0,00 | 15.0 | 60.0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 57.922,91 | 113.5 | 135.0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |
| **14205** | | **11.440.944,99** | **12.916.0** | **16.518.7** | **16.036,0** | **16.036,0** | **16.036,0** |

**Viðmerkingar**

*83809 Leiguinntøkur*

Leiguinntøkur eru heilt óvissar. Samkomuhøllin verður við óregluligum millumbilum útleigað, og mett verður við nógvum fyrivarni *kr. 25.000.*

*ad. 103048 Løn/tænastumenn*

Bruttolønir pr. 1. sept. 1982 (fastar lønir).
Rektari, lektor (1), lærarar (2), skúlatænari (1), kr. 902.652 + 13,5% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, *kr. 1.038.049.*

Sí annars skjal 1.

*ad. 103143 Løn/starvsfólk*

1) Skrivstovukvinna, kr. 120.273 + 13,5% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, kr. 138.313.
2) Hjálparmaður hjá skúlatænaranum, kr. 131.160 + 13,5% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, kr. 150.834.
3) Skotið verður upp at fáa ein hjálparmann hjá skúlatænaranum afturat. Tað stóra næmingatalið nú (u. 520) og tað, at kostdeildin (bústaðirnir) er í fleiri støðum (í Hoydølum og niðri í Havnini), er orsøk til meiri arbeiði, enn teir báðir verandi skúlatænararnir kunnu yvirkoma. Ein tílíkur hjálparmaður afturat eigur at vera handverkari og verður at seta sum starvsmaður í 9. lønarflokki á helst 10. stigi, t.e. kr. 123.960 + 13,5% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, kr. 142.554.
   1), 2) og 3) tilsamans *kr. 431.700.*

*ad. 103168 Løn/sáttmálaløn.*

Bruttolønir pr. 1. sept. 1982 (fastar lønir).
Lektor (1), adjunktar (41), kr. 6.206.148. —Møguleiki er fyri, at næmingatalið í 1983/84 fer at økjast í tann mun, at tað verður 1 flokkur meir enn í ár (28 móti 27), soleiðis at vit mugu rokna við 2 lærarum afturat á kr. 13.000 = kr. 26.000 um mánaðin = kr. 312.000 um árið. Sostatt sáttmálaløn kr. 6.206.148 + 312.000 = kr. 6.518.148. Roknað verður við 13,5% vegna prístalsvøkstur pr. 1/4 1983 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84, harumframt 1,5% frítíðarløn. Tilsamans *kr. 7.821.777.*

Sí annars skjal 1.

*ad. 103222 Løn/reingerð*

Vegna hækkandi lønir fer henda útreiðsla í 1983/84 væntandi at krevja *640.000 kr.*

*ad. 103288 Løn/onnur.*
Fyrifallandi arbeiði, m.a. næmingar o.o., ið hjálpa til við skráseting-ararbeiði á bókasavninum, reinskriving av tímatalvu, flyting av borðum og stólum til royndir og prógtøkur *19.000 kr.*(hækkað og hækkandi tímaløn).

*ad. 103296 Tímaløn.*
Lønir pr. 1. sept. 1982. Tímalærarar (10) kr. 831.444. Roknað verður við 13,5% vegna prístalsvøkstur pr. 1/4 1983 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84, barafturat frítíðarløn 1,5%. Tímalønt tilsamans *kr. 997.732.* — Sí annars skjal 1a.

*ad 103405 Úrtíðarlønir.*
1) Tænastumenn: kr. 242.520.
2) Sáttmálaløn: *kr. 2.569.449.*
Tilsamans kr. 2.811.969.
Roknað verður við 13,5% vegna prístalshækking pr. 1/4 1983 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84. — 1) og 2) tilsamans *kr. 3.332.183.*
Sí annars skjal 1.

*ad. 103509 Samsýningar*
a) Til felagstímar fyri allar skúlaflokkar (upp í 10 t. um árið), har fólk uttanífrá halda fyrilestrar, spæla fónleik o.a.m., *8.000 kr.* (talið á flokkum er so stórt nú, at samkomuhøllin ikki rúmar øllum í senn, og hvør felagstími má tí avgreiðast í tveimum umførum).
b) Umsjón við skrivligum prógtøkum og royndum *20.000 kr.* (hækkað og hækkandi tímaløn og títtari nýtsla av umsjónarfólkum).
a) og b) tilsamans *28.000 kr.*

*ad. 113202 Ferða- og dagpeningur innanlands*
Ferðaútreiðslur v.m. hjá HF-lærarum úr Suðuroy til Hoydalar *15.000 kr.*

*ad. 113243 Ferða- og dagpeningur uttanlands* hoyrir undir Landsskúlafyrisitingina.

*ad. 213105 El, hiti og vask*
a) el-nýtslan 1981/82 var u. kr. 98.000. Um roknað verður við 12,5%

hækking, verður henda útreiðsla mett til 110.300 kr. + ljósperur 10.000 kr. = 120.300 kr.

b) oljuprísurin var pr. 1/7-82 kr. 2.510 pr.t. Við 12,5% hækking og nýtslu 110 t. árliga verður henda útreiðsla mett til kr. 310.500,- við øllum hugsandi fyrivarni, eisini viðvíkjandi pkt. a)!

c) vaskievni 24.700 kr.

a), b) og c) tilsamans *455.500 kr.*

*ad. 213408 Umvælingar v.m.*

Upp í hesa konto kemur tað, sum krevst til umvælingar av ognini innan og uttan (÷innbúgv).

a) viðlíkahald av skúlanum innan, kr. 70.000.

b) viðlíkahald av skúlanum uttan, kr. 50.000 (viðgerð av vindeygunum á vestursíðuni).

unum á vestursíðuni).

c) viðlíkahald av viðalundini, kr. 10.000.

d) Við tað, at lærugreinin geografi hevur alt ov lítið pláss — vit hava 1 geografistovu (fakhøli) — og fleiri flokkar hava geografi í senn, er neyðugt at fáa innrættað eina av teimum vanligu stovunum soleiðis, at hon umframt kann nýtast til geografi. Til hetta krevjast ymsir serhentleikar, so sum skáp, hillar, amboð v.m., sum undir einum verða mettir til kr. 86.700 (sí skjal 2).

e) Av trygdarorsøkum, um eldur skuldi komið í, eiga úthurðarnar at ganga úteftir. Hetta letur seg ikki gera, soleiðis sum hurðarnar eru ísettar upprunaliga, og tí er ein loysn at útskifta glasið í úthurðunum við splintfríum glasi. Henda útreiðsla verður eftir ráðførslu við glasvirki mett til 12.700 kr.

f) Umvæling og vask av gardinum í skúlastovunum, kr. 8.000.

a)-f) tilsamans, *kr. 236.4.*

*ad. 213607 Størri umbyggingar*

a) Bygging (úr betong) av gassgoymslu til fysikk, kemi og biologi, tí vegna eld- og spreingivanda eigur ein tílík at vera uttanfyri og gassleiðningar at leggjast inn í hølini, kr. 60.000.

b) Vegna tað stóra læraratalið nú er lærarastovan ov lítil. Til at bøta um hetta fer at hjálpa nógv at flyta øll skápini hjá lærarunum úr lærarastovuni út á gongina, og eisini eru nýggj skáp neyðug til nýggjar lærarar, kr. 20.000.

c) í sangstovuni er tørvur á einum skilarúmi og hillum til eina instrumentgoymslu, kr. 20.000.
d) Umbygging av skiftingar- og brúsirúmi í sambandi við fimleikaundirvísingina, kr. 70.000 (sí skjal 3, 3a, 3b, 3c).
a)-d) tilsamans *kr. 170.000.*

*ad. 21307 Tryggingar*
a) Brunatrygging v.m. av skúlabygningi, innbúgvi, undirvísingaramboðum, bókasavni kr. 31.000.
b) vanlukkutrygging av lærarum, skúlatænarum, starvsfólki, reingerðarfólki og næmingum í arbeiðstíðini + ábyrgdartrygging amboðum, bókasavni kr. 31.100.
a)-b) tilsamans *kr. 44.600.*

*ad. 233051 Innbúgv.*
a) Gardinur til myrkalegging av 4 skúlastovum, kr. 13.000
b) Innbúgv til lærarastovuna, kr. 14.000
c) Skúlaborð og -stólar kr. 30.000
d) 3 smærri skúlatalvur, kr. 6.000
e) Innbúgv til lestrarvegleiðingarstovu, kr. 10.000
f) Skáp til fimleikahøllina, kr. 10.000
g) Arkivskáp, skrivimaskina, borð til inspektørskrivstovu, kr. 10.000
h) Borð og vøsk í biologihøli, kr. 40.000.
i) Skrivimaskinan á rektaraskrivstovuni er 10 ára gomul og ikki góð longur til tað nógva brúkið. Søkt verður um kr. 13.000 til nýggja skrivimaskinu
a)-i) tilsamans *146.000 kr.*

*ad. 233155 Prentlutir*
a) Pappír til ljósprent (Rank-Xerox), kr. 52.500
b) Tilfar til fotokopitól, kr. 6.000
c) Pappír v.m. til datatól, kr. 5.000
a)-c) tilsamans *kr. 63.500.*

*ad. 233409 Leiga av maskinum.*
Hækkandi leiga og 1 maskina afturat at nøkta tørvin krevur *kr. 115.000*

*ad. 253085 Bókakeyp og innbinding*
Henda útreiðsla er (umframt innbinding) serliga ætlað til 1) øking og nútímansføring av serstøkum bókum og bókaverkum og 2) bókum til útláns til næmingarnar, sum úrdrøg í teimum ymsu fakunum verða

lisin úr, og sum vit vegna prísin ikki kunnu krevja, tey skulu ogna sær aftur at teimum nógvu og kostnaðarmiklu skúlabókunum, tey (forældrini) noyðast at keypa sjálvi. (Í Danmark fáa *allir* næmingar *allar* skúlabøkur til láns frá skúlanum, og hjá okkum eru bert *2 skúlar* av hesum slagnum ímóti u. 150 studentaskúlum og HF-skeiðum har!).

— Tíðarrit koma eisini upp í útreiðsluna umframt sett av orðabókum í teimum ymsu málunum, vit hava á tímaskránni, og sum skulu vera til taks til royndir og prógtøkur. — Samanlagt verður tørvurin mettur til *kr. 100.000.*

*ad. 253093 Søvnini*

Søvnini eru dýr at viðlíkahalda og endurnýggja við alsamt hækkandi prísum. Serliga endurnýggjan er neyðug, tí nógv av serliga fysikk- og kemitólunum eru gomul, slitin og lutvíst avoldað, og nógvir eru næmingarnir um tey, í øllum fakum.

1) Fysikktól. Hesi eru kostnaðarmikil, eisini í viðlíkahaldi, og eru fysikklærararnir komnir ásamt um at søkja um kr. 100.000 til hesa útreiðslu (sí skjal 4).
2) Kemitól. Til nýkeyp, kemikaliir og glasapparatur, kr. 30.000.
3) Musikktól. Skotið verður upp kr. 15.000.
4) Geografiamboð (kort, atlas v.m.), kr. 25.000.
5) Biologi, kr. 40.000.
6) Fiskivinna, kr. 15.000.
7) Fimleikur, kr. 25.000.
8) Søgusavn (kort v.m.), kr. 15.000.
9) Religiónssavn (kort v.m), kr. 4.000.
10) Samfelagsfr. savn, kr. 15.000.
11) Tilfar til royndir í ymsum undirvísingarhættum, kr. 5.000.
12) AV-tól a) umvælingar, perur v.m. kr. 15.000
    b) keyp av bandupptakarum, bondum, over-head projektorum, filmtólum, videotóli, kr. 81.900.
13) Datatól. 3 datatól á kr. 40.000 = 120.000 (sí skjal 5 og 5a).
14) Roknimaskinur, kr. 5.000.

1)-14) tilsamans *kr. 510.900.*

*ad. 253857 Vøllurin*

Til at gera vøllin nýtiligan til bóltspæl og annan ítrótt metir ein »fløtunevnd« í lærararáðnum, at *kr. 60.000* eru neyðugar fyri 1983/84.

*ad. 253903 Aðrar útreiðslur*
Á hesi konto verður sett tað nógva ymiska, sum ikki kann skipast undir aðrar kontoir. Nógv av tí er óvæntað, ið stingur seg upp gjøgnum árið, og ilt er tí at meta eitt toluliga haldgott tal.
a) Krit verður mett til kr. 9.000
b) Pappír v.m. til royndir og prógtøkur, kr. 13.000
c) Lýsingar, kr. 5.000
d) Ársritið, kr. 20.000
e) Stuðul til næmingaarbeiðið í næmingafelagnum, kr. 2.500
f) Flytiútreiðslur hjá nýggjum lærarum, kr. 25.000
g) Umboðan, kr. 3.000
h) Evnisvika, kr. 8.000
i) Í uppskotinum fyri inniverandi fíggjarár (1982/83) varð søkt um kr. 20.000 um árið í 5 ár at seta í grunn við tí endamáli at geva út eitt minnisrit í 1987, tá ið skúlin verður 50 ár. Tær kr. 20.000 vóru játtaðar fyri 1982/83, og fyri 1983/84 verður so aftur søkt um kr. 20.000 afturat til sama endamál (og at seta í grunn).
j) Til samskifti við skúlar í øðrum norðurlondum, t.e. senda skúlaflokk ella -flokkar at vitja skúlar í øðrum norðurlondum, verður søkt um kr. 30.000.

a)-j) tilsamans *kr. 135.500.*

*ad. 213806 Leiguútreiðslur*
a) Ítróttarhøllin á Hálsi, 12 tímar um vikuna á kr. 170 (kr. 150 + 12,5%) = kr. 2.040 um vikuna. Í 40 vikur verður hetta kr. 81.600 + ein ítróttardag í 8 tímar = kr. 1.360, tilsamans kr. 82.960.
b) Vegna stórt tal av næmingum til prógtøku í 1983 verður neyðugt eins og í 1982 at leiga ítróttarhøllina í 5 dagar á kr. 3.000 = kr. 15.000

a) + b) tilsamans *kr. 98.000*

*ad. 253077 Ekskursiónir*
Lærugreinir sum biologi, fiskivinna, geografi, samfelagsfrøði hava ekskursiónir til aðrar oyggjar og bygdir fyri neyðini. Flokkarnir eru nógvir, gisting (á bíligasta hátt, sjálvandi) og ferðaútreiðslur (sum eru hækkandi og ikki blúgvar) eru ikki at koma uttanum; tí verður henda útreiðsla mett til *kr. 40.000.*

*Skjal 1*

| **Høydalar**<br>*Tænastumenn:* | | **Fastlønn** | | **Yvirtíðarlønn** | **Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10%** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rektari ..... | kr. | 254.160 | kr. | 0.000 | |
| Lektor ..... | — | 189.792 | — | 85.400 | |
| Lærari ..... | — | 168.624 | — | 78.000 | |
| Lærari ..... | — | 159.276 | — | 99.120 | |
| Skúlatænari ..... | — | 130.800 | — | 0.000 | |
| | **kr.** | **902.652** | **kr.** | **242.520** | |
| *Sáttmálaløn:* | | | | | |
| Lektor ..... | kr. | 209.604 | kr. | 25.284 | kr. 20.960 |
| Adjunktur ..... | — | 158.604 | — | 94.680 | — 15.860 |
| — ..... | — | 209.604 | — | 58.968 | — 20.960 |
| — ..... | — | 209.604 | — | 63.504 | — 20.960 |
| — ..... | — | 113.640 | — | 71.568 | — 11.364 |
| — ..... | — | 152.076 | — | 68.040 | — 15.208 |
| — ..... | — | 176.028 | — | 74.844 | — 17.603 |
| — ..... | — | 145.320 | — | 63.084 | — 14.532 |
| — ..... | — | 115.440 | — | 78.288 | — 11.544 |
| — ..... | — | 189.348 | — | 145.140 | — 18.935 |
| — ..... | — | 161.580 | — | 155.328 | — 16.158 |
| — ..... | — | 147.324 | — | 68.040 | — 14.732 |
| — ..... | — | 138.480 | — | 79.380 | — 13.848 |
| — ..... | — | 143.148 | — | 40.596 | — 14.315 |
| — ..... | — | 143.148 | — | 17.748 | — 14.315 |
| — ..... | — | 144.840 | — | 105.480 | — 14.484 |
| — ..... | — | 189.348 | — | 23.904 | — 18.935 |
| — ..... | — | 202.260 | — | 56.700 | — 20.226 |
| — ..... | — | 73.848 | — | 45.948 | — 7.385 |
| — ..... | — | 145.380 | — | 19.392 | — 14.538 |
| — ..... | — | 171.156 | — | 16.932 | — 17.116 |
| — ..... | — | 159.132 | — | 28.020 | — 15.913 |
| — ..... | — | 152.076 | — | 94.140 | — 15.208 |
| — ..... | — | 149.580 | — | 34.020 | — 14.958 |

| | Føst løn | Yvirtíðarløn | Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10% |
|---|---|---|---|
| Adjunktur ..... | kr. 130.440 | kr. 40.812 | kr. 13.044 |
| — ..... | — 41.112 | — 23.520 | — 4.111 |
| — ..... | 152.076 | — 124.512 | — 15.208 |
| — ..... | — 156.444 | ... 31.752 | — 15.644 |
| — ..... | — 149.580 | 129.264 | ... 14.950 |
| — ..... | ... 52.500 | — 39.684 | — 5.250 |
| — ..... | — 173.532 | — 14.460 | — 17.353 |
| ... ..... | — 90.180 | — 34.992 | — 9.018 |
| — ..... | . 45.492 | — 10.476 | — 4.549 |
| ... ..... | — 156.444 | — 58.968 | — 15.644 |
| — ..... | — 143.148 | — 19.392 | — 14.315 |
| — ..... | 65.472 | — 55.248 | ... 6.547 |
| — ..... | — 152.076 | .... 97.512 | — 15.208 |
| — ..... | — 171.156 | — 86.172 | — 17.116 |
| — ..... | — 171.156 | .... 77.100 | — 17.116 |
| — ..... | — 171.156 | — 50.496 | — 17.116 |
| ... ..... | — 202.260 | — 83.688 | — 20.226 |
| — ..... | — 181.356 | — 62.400 | — 18.136 |
| **Tilsamans** | **kr. 6.206.148** | **kr. 2.569.449** | |

*Skjal 1a*

**Hoydalar**

*Tímaløn:*

| | |
|---|---|
| Tímalærari ..... | kr. 158.568 |
| | 123.048 |
| | 147.780 |
| | 63.180 |
| | 70.788 |
| | 63.180 |
| | 12.360 |
| | 103.800 |
| | 47.328 |
| | 41.412 |
| **Tilsamans:** | **831.444** |

---

Sbrt. skriv landsstýrisins dagf. 20. aug. 1982 (j.nr. 2118-2-21):

Vísandi til skriv frá landsskúlafyrisitingini dagfest 20. juli 1982 viðvíkjandi eykajáttan til umbygging av skiftingar- og baðirúmum á studentaskúlanum verður sagt frá, at landsstýrið kann ganga umsóknini á møti.

Mælt verður til, at skúlin tekur útreiðslurnar við á fíggjarlógaruppskotið 1983/84.

---

Sbrt. skriv Landsverkfrøðingsins dagf. 29. juni 1982:

Eftir áheitan er gjørd tekning av sundurbýting av baðirúmi á skúlanum, soleiðis at nú verður annar helmingurin til konufólk og hin til mannfólk.

Kostnaðurin av hesum við teimum neyðugu innleggingum og umvælingum verður mettur til umleið 60.000,- kr.

Sbrt. skriv dagf. 10. juni 1982 frá ítróttarlærarunum í Hoydølum:

Eftir áheitan frá ítróttarlærarunum á Føroya studentaskúla og HF-skeið søkir rektarin um eykapening til ábøtur á skiftingar- og baðirúm skúlans.

Ábøturnar eru neyðugar, av tí at ikki ber til sum er at undirvísa gentum og dreingjum saman. Tílík undirvísing (»kønsintegreret undervisning«) er vanlig á flestu studentaskúlum. Harafturat eru flokkarnir vorðnir ógvuliga stórir og fara helst at verða enn større; tí verður tað við teimum skiftingar og baðilíkindum, sum eru, ógjørligt hjá næmingunum at fáa nóg góða undirvísing í ítróttartímanum og verða lidnir í rættari tíð til tímin eftir.

Eftir samráðingar við Kr. Kristoffersen byggifrøðing hava vit valt ódýrasta ábótamøguleikan, sum er at býta núverandi baðirúmið í tvey og gera nýtt skiftingarrúm næst hjá.

Lærararáðið styðjar ynskið um nevndu ábøtur, sum tó bert eru fyribilsloysn.

Tað er okkara vón, at umsóknin verður viðgjørd sum skjótast og við vælvild, so at ábøturnar kundu verið gjørdar, áðrenn nýggja skúlaárið byrjar, tí tey arbeiðslíkindi, vit hava nú, eru ótolandi bæði fyri lærarar og næmingar.

---

Sbrt. skriv dagf. 28. aug. 1982 frá fysikklærarunum á studentaskúlanum í Hoydølum:

Viðvíkjandi fysikksavninum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði:

Tann stóra næmingatilgongdin hevur tikið hart uppá hetta, fleiri av teim stóru tólunum eru brotin, til dømis Franck-Hertz-rørið, oscilloskopið og stroboskopið. Geiger-Müller-teljarin fungerar ikki longur, og tað sama kann sigast um útstýrið til fastsetan av Planecksa konstanti. At umvæla hesi tól loysir seg helst ikki, deils eru umvælingar altíð kostnaðarmiklar, og deils eru tólini so gomul (16 ár), at vit meta, at tað er best at keypa nýggj.

Nýggj tól, sum mugu keypast, eru: ein vekt, ein streymforsýning, ein mikroprocessara og fleiri av teim vanligu elektrisku málitólunum (tað er fleiri ferðir komið fyri, at ikki allir næmingarnir kunnu gera venjingar sama tíma vegna tóltrot).

Tá vit aftrat hesum leggja útreiðslur til tað vanliga viðlíkahaldið,

koma vit (fysikklæraranir) til, at hetta kann gerast fyri umleið 100.000 kr., tí verður søkt um hesa upphædd.

---

Sbrt. skriv dagf. 29. aug. 1982 frá Jóan Eyðfinni Olsen, dátulærara:

Datatólini skulu brúkast í frálæruni í datalæru. Lærugreinkonsulenturin í datalæru skrivar í frálæruætlanini, at endamálið við frálæruni er:

1. at meta um samspælið millum edv, einstaklingin og samfelagið.
2. at duga at algoritmisera, at meta um og royna algoritmur.
3. at meta um ymisk aspekt í tí teknologisku menningini innan edvøkið.

Øll punktini í endamálsorðingini krevja so statt, at næmingarnir læra at programmera:

ad 1 og 3: Fyri at gera metingarnar mugu næmingarnir duga at handfara eitt datatól og nýta tað sum amboð til loysn av eini uppgávu. Fyri at datatól kann loysa eina uppgávu, má maskinan programmerast til hetta.

ad 2. Her stendur stutt sagt, at næmingarnir skulu læra at programmera.

Frálæran í programmering er skipað á sama hátt sum í øðrum lærugreinum (sumt mugu næmingarnir læra heima og sumt í skúlanum):

— heima mugu næmingarnir læra seg programmeringarmálið og skriva algoritmur, sum skulu loysa ymisk problem, og skriva programm.
— í skúlanum mugu næmingarnir læra at handfara datatól, skriva (tasta programmini inn á eina datamaskinu og kanna, um hon skilir tey.

Til seinast mugu næmingarnir royna (testa) programmini og á tann hátt kanna, um maskinan ger tað, ið ætlað var. Alt hetta skulu næmingarnir gera, meðan teir sita við eini datamaskinu. Um tað ikki skal taka alt ov langa tíð, má ein lærari vera hjástaddur og leiðbeina. Sostatt má arbeiðið við tí álvum datatólunum fara fram í tímunum.

Her í Hoydølum hava 12 næmingar 3 tímar um vikuna í datalæru. Teir fara ikki at duga at programmera, um teir bert sita 3 : 45, 12 [2 min. um vikuna við eitari maskinu. Lærugreinkonsulenturin í

datalæru vitjaði skúlan áðrenn summarfrítíðina. Hann segði, at um fleiri enn 3 næmingar arbeiða við hvørjari maskinu, kann endamálið í frálæruætlanini ikki røkkast. Hann helt, at hóskandi var, at ein flokkur við 12 næmingum hevði 8 maskinur.

Skúlin hevur í dag eina datamaskinu. Um frálæran í datalæru skal halda fram, mugu vit sum skjótast fáa 3 datamaskinur afturat. Hvør maskinan kostar 40.000 kr., og er tað tí bráðneyðugt við 120.000 kr. til keyp av datatólum.

Tann nýggja teknologiin, ið tekur seg fram allastaðni, er øll stýrd av ymiskum datatólum. Tey fara tí í framtíðini at fáa alstóran týdning fyri einstaklingin og samfelagið sum heild. Um ikki í minsta lagi ein partur av okkara ungfólki lærir, hvussu hesi tól skulu brúkast, koma tey at standa heilt ófyrireikað, tá ið tey seinni skulu møta teim avbjóðingum, sum tann nýggja teknologiin ber í sær. Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at Klaksvíkar Skúli hevur ætlan um keyp av 4 skermum, sum skulu brúkast í frálæruni í framhaldsdeildini.

Av tí at datatól verða nýtt víða hvar innan vinnulívið og tað almenna, er tað longu í dag ein fyrimunur hjá tí næmingi, ið søkir starv, at hann hevur havt datalæru á HF. Í skúlanum eru eisini dømi um næmingar, sum eru lidnir við HF, men sum koma aftur og spyrja, um teir ikki kunnu sleppa at taka datalæru afturat. Arbeiðsgevarin vil gjalda teimum løn fyri ta tíðina, tey ganga í skúla.

## Fíggjaruppskotið fyri 1983/84 og ætlan fyri 1984/85 og 1985/86

### Rakstrarstað nr. 14205 Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar

| Konto | | Uppskot 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur ..... | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn ..... | 1.038.1 | 1.038.1 | 1.038.1 |
| 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 431.7 | 431.7 | 431.7 |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn ..... | 7.822.0 | 7.822.0 | 7.822.0 |
| 103222 | Løn/reingerð ..... | 640.0 | 640.0 | 640.0 |
| 103288 | Løn/onnur ..... | 19.0 | 19.0 | 19.0 |
| 103296 | Tímaløn ..... | 997.8 | 997.8 | 997.8 |
| 103405 | Úrtíðarlønir ..... | 3.332.2 | 3.332.2 | 3.332.2 |
| 103509 | Samsýningar ..... | 28.0 | 28.0 | 28.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanl. . | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanl. . | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 455.4 | 455.5 | 455.5 |
| 213408 | Umvælingar v.m..... | 236.4 | 130.0 | 130.0 |
| 213607 | Størri umbyggingar ..... | 170.0 | 0.0? | 0.0? |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 44.6 | 44.6 | 44.6 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 98.0 | 98.0 | 98.0 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 146.0 | 85.0 | 80.0 |
| 233155 | Prentlutir ..... | 63.5 | 63.5 | 63.5 |
| 233259 | Postgjald ..... | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233354 | Telefon og telex ..... | 28.0 | 28.0 | 28.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 115.0 | 115.0 | 115.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 9.0 | 9.0 | 9.0 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding .. | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| 253093 | Søvnini ..... | 510.9 | 300.0 | 300.0 |
| 253857 | Vøllurin ..... | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 135.0 | 135.0 | 135.0 |
| **14205** | | **16.518.7** | **15.970.4** | **15.965.4** |

**Frágreiðing**

Út frá uppskotinum (og ætlaðu prislegu) fyri 1983/84 er meting gjørd fyri 1984/85 og 1985/86. Í teimum flestu førunum eru tølini tey somu fyri tey bæði seinru árini sum fyri 1983/84, men í nøkrum førum eru tey lækkað. Iletta seinra stendst av, at konti sum: størri umbyggingar, innbúgv, søvniui fyri 1983/84 fevna um íleggingar fyri fleiri ár fram, solciðis sum tað átti at skilst av viðmerkingunum til avvarðandi konti. Men *øll* tøl verða at taka við nógvum fyrivarni sum eitt ótrygg *meting*; eg kann t.d. ikki spáa um, hvat kann koma fyri av størri umbyggingum í 1984/85 og 1985/86, ella hvat pappírsnýtls og leiga av maskinum fara at krevja (bert at pappírsútreiðslan fyri 1984/85 eftir meting helst fer at vera u. kr. 8.000 meir og í 1985/86 u. 16.000 meir í mun til 1983/84, og leigaútreiðslan fyri maskinur ávikavist kr. 10.000 og kr. 25.000 meir.

Viðvíkjandi lønum (tænastumenn, starvsfólk, sáttmálaløn, reingerð, timaløn, úrtíðarlønir, onnur) er at siga, at tær fyri 1984/85 og 1985/86 eru settar til tað sama sum mett fyri 1983/84. Annað kann ikki gerast, um ætlanin fyri tey bæði seinru árini skal gerast í somu prislegu sum 1983/84. Men fyrivarni má verða tikið fyri komandi prishækkingum, solciðis at tey tølini, sum komið verður fram til, tá ið figgjar*uppskot* skulu gerast fyri tey bæði seinru árini, verða størri enn fyri 1983/84. — Eisini skal viðmerkjast, at um tað fer at eydnast okkum at fáa fleiri sáttmálaløntar lærarar til komandi skúlaár, verður talið fyri úrtíðarlønir minni, meðan talið fyri sáttmálalønir verður størri. Men einki kann sigast ella metast um tí, hvussu nógv annað talið fer at lækka og hitt at hækka.

**Sbrt. skriv dagf. 2. sept. 1982 frá Kostdeild Studentaskúlans:**

Uppskot til figgjarætlan fyri raksturin av kostdeild Føroya Studentaskúla og HF-skeið figgjarárið 1983/84. Rakstrarstað nr. 14 25 7.

| Konto | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Stovnsins uppskot 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur ..... | ÷ 51.306,50 | ÷ 46.0 | ÷ 50.0 | ÷ 50,0 | ÷ 50,0 | ÷ 50,0 |
| 83929 | Næmingagjald (skúlar) . | ÷ 256.900,00 | ÷ 258.0 | ÷ 454.0 | ÷ 454,0 | ÷ 454,0 | ÷ 454,0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 0,00 | 155.0 | 165.0 | 165,0 | 165,0 | 165,0 |
| 103222 | Løn/reingerð ..... | 157.318,96 | 130.0 | 198.0 | 198,0 | 198,0 | 198,0 |
| 103288 | Løn/onnur ..... | 1.153.026,40 | 1.200.0 | 1.560,0 | 1.560,0 | 1.560,0 | 1.560,0 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 247.039,64 | 217.3 | 296.0 | 296.0 | 296,0 | 296,0 |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 0,00 | 0.0 | 20.0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 0,00 | 0.0 | 192.0 | 192,0 | 192,0 | 192,0 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 21.434,40 | 30.0 | 40.0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 233354 | Telefon og telex ..... | 10.448,40 | 6.0 | 10.0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 253107 | Kostur ..... | ÷ 144.008,52 | ÷ 200.0 | ÷ 150.0 | ÷ 150,0 | ÷ 150,0 | ÷ 150,0 |
| 253306 | Amboð ..... | 36.984,79 | 35.0 | 45.0 | 45,0 | 45,0 | 45,0 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútr.... | 289.579,00 | 170.0 | 190.0 | 190,0 | 190,0 | 190,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 49.534,40 | 90.0 | 90.0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| | | **1.513.150,97** | **1.529.3** | **2.152.0** | **2.152,0** | **2.152,0** | **2.152,0** |

Viðmerkingar til roknskapin fyri fíggjarárið 1981/82:

1. Gjaldstovan hevur av misgáu bókað roknskapin fyri seinnu helvt av 1980/81 undir roknskapin fyri 1981/82.
2. Munurin millum játtanina fyri 1981/82 og roknskapin fyri sama fíggjarár er komin í á henda hátt:
   a) Næmingatalið á kostdeildini varð skorið niður, tá nímini vórðu tikin til skúlastovur. Av hesum komu kr. 63.100,00 minni inn, enn roknað varð við.
   b) Tað vísir seg at vera ógvuliga torført at meta nágreiniliga um munin millum innkeyp av matvørum og søluna av mati, tí sølan kann vera so ójøvn. Her eru vit farnir kr. 45 991,48 skeivir.
   c) Eykajáttan kr. 60.325,67, sum stóðst av, at hol kom á hitaketilin í Nýggja húsi, og bæði ketil og oljuflýring máttu skiftast út.
   d) Eftir eru so kr. 56.733,82, sum meginparturin stavar frá konto 253314 Umsitingarútreiðslur.

Viðmerkingar til uppskot stovnsins fyri 1983/84.

*ad. 83929 Næmingagjald*
Í uppskotinum er roknað við kr. 6.000,- at gjalda hjá hvørjum næmingi árliga fyri at búgva á kostdeildunum (Gamla hús, Nýggja hús og í Stórustovu) og kr. 8.000,- árliga hjá teimum, sum búgva við Varðagøtu nr. 30.

*ad. 103222 Løn/reingerð*
Hækkingin kemur, umframt av vanligum lønarvøkstri, eisini av, at reingerðarfólk hava fingið longri arbeiðstíð, nú húsini í Stórustovu eru við.

*ad. 103288 Løn/onnur*
Tann rættiliga stóri munur millum játtanina seinasta fíggjarár og hetta stendst av lønarvøkstri, men eisini av, at fryktandi kann vera fyri, at heldur lítið er ætlað til seinasta ár (82/83). Eisini eru útreiðslur av tímalønum til fólk, sum hjálpir til á ymsan hátt, tá ið á stendur.

*ad. 213105 El, hiti og vask*
Her eru útreiðslur til húsini í Stórustovu og í Varðagøtu komnar aftrat.

*ad. 213702 Ognartryggingar v.m.*
Hetta er nýggj konto.

*ad. 213806 Leiguútreiðslur* (Nýggj konto)
Leiga fyri húsini við Varðagøtu nr. 30 til næmingabústað.

*ad. 253903 Aðrar útreiðslur*
Stórur partur av hesi upphædd verður nýttur til renovatiónsútreiðslur og til at fríðka aftur uttan um húsini. Har hevur mangt ligið í órøkt nú í fleiri ár.

Hækkingar eru gjørdar fyri vanligan lønar- og prísvøkstur.

**Ad konto 14307 Føroya Sjómansskúli**
Sbrt. skriv dagf. 19. august 1982:

**Fíggjarlógaruppskot 1983/84 fyri Føroya Sjómansskúla, 14307**

| Konto | | Rokuskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | løn/tænastumenn ..... | 932.630,33 | 997.000 | 1.258.270 | 1.258.270 | 1.258,7 | 1.258,2 |
| 103127 | — /lærarar ..... | 701.078,89 | 894.000 | 801.750 | 801.750 | 801,7 | 801,7 |
| 103143 | — /starvsfólk ..... | 157.899,17 | 189.000 | 210.360 | 210,360 | 210,4 | 210,4 |
| 103222 | — reingerð ..... | 221.609,39 | 257.000 | 274.150 | 274.150 | 274,1 | 274,1 |
| 103288 | — /onnur ..... | 195.597,24 | 250.000 | 306.000 | 306.000 | 306,0 | 306,0 |
| 103405 | úrtíðarlønir ..... | 540.142,76 | 558.000 | 568.400 | 568.400 | 568,4 | 568,4 |
| 113202 | ferða- og dagpeningur .. | | 40.000 | 10.000 | 10.000 | 10,0 | 10,0 |
| 113243 | — — — .. | 17.250,15 | »0« | 40.000 | 40.000 | 40,0 | 40,0 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 115.956,33 | 135.000 | 152.000 | 152.000 | 152,0 | 152,0 |
| 213503 | umsiting ..... | 59.681,63 | 90.000 | 100.000 | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| 213702 | ognartrygging ..... | 14.609,00 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20,0 | 20,0 |
| 233051 | innbúgv ..... | 15.109,25 | 25.000 | 30.000 | 30.000 | 30,0 | 30,0 |
| 233354 | telefon og telex ..... | 10.778,50 | 20.000 | 25.000 | 25.000 | 25,0 | 25,0 |
| 233561 | aðrar skrivstovuútreiðslur | 35.400,97 | 40.000 | 50.000 | 50.000 | 50,0 | 50,0 |
| 253306 | amboð ..... | 99.778,09 | 500.000 | 300.000 | 300.000 | 300,0 | 300,0 |
| 253903 | aðrar útreiðslur ..... | 28.007,72 | 35.000 | 44.070 | 44.070 | 44,1 | 44,1 |
| 253977 | eldsløkking ..... | 75.014,10 | 90.000 | 110.000 | 110.000 | 110,0 | 110,0 |
| | | **3.220.543,52** | **4.140.000** | **4.300.000** | **4.300.000** | **4.300,0** | **4.300,0** |

**Viðmerkingar**

*ad 103048*

| | |
|---|---|
| stjóri | 205.945 |
| varastjóri | 182.357 |
| 1 sjómansskúlalærari | 85.964 |
| 1 — | 159.278 |
| 1 — | 171.928 |
| 1 — | 153.451 |
| 1 — | 147.930 |
| 1 1/2% feriuløn | 16.600 |
| hædd fyri prístalshækking, 12% | 134.815 |
| | 1.258.270 |

*ad 103127*

| | |
|---|---|
| 1 sjómansskúlalærari | 153.451 |
| 1 — | 147.930 |
| 1 — | 137.749 |
| 1 — | 133.058 |
| 1 — | 133.058 |
| 1 1/2% feriuløn | 10.600 |
| hædd fyri prístalshækking, 12% | 85.904 |
| | 801.750 |

*ad 103143*

| | |
|---|---|
| skúlatænari | 125.760 |
| 1/2 starvsfólk | 59.280 |
| 1 1/2% feriuløn | 2.780 |
| hædd fyri prístalshækking | 22.540 |
| | 210.360 |

*ad 103222*

| | |
|---|---|
| 5 reingeringskvinnur á kr. 43.300 í ársløn ..... | 216.500 |
| 1 1/2% feriuløn ..... | 3.250 |
| høvuðsreingering ..... | 25.000 |
| hædd fyri prístalshækking, 12% ..... | 29.400 |
| | 274.150 |

*ad 103288*

| | |
|---|---|
| 1 tímalærari, sjórætt ..... | 104.800 |
| 1 — heilsulæra ..... | 62.400 |
| 9 1/2% feriuløn ..... | 16.000 |
| vikarløn vegna sjúku, eyka útb. hjá lærarum, eykaskeið | 90.000 |
| hædd fyri prístalshækking, 12% ..... | 32.800 |
| | 306.000 |

*ad 103405*

| | |
|---|---|
| úrtíðarlønir ..... | 500.000 |
| 1 1/2% feriuløn ..... | 7.500 |
| hædd fyri prístalshækking, 12% ..... | 60.900 |
| | 568.400 |

*ad 253306*

| | |
|---|---|
| til viðlíkahald, endurnýggjan, umvæling av tólum .... | 300.000 |

*ad 253977*

| | |
|---|---|
| útreiðslur til eldsløkkingarskeið, læknakanningar og annað hesum viðvíkjandi ..... | 110.000 |

*ad øllum*
Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingaruppskoti seinni, um umstøðurnar broytast munandi.

Vit loyva okkum at minna á tað nú skjótt 4 ára gamla tilbygningsprojektið og gera vart við, at umstøðurnar gerast støðugt trengri, og krøvini til útbúgvingina økjast í hvørjum.

Tað er tí ógvuliga átrokandi at fara undir nevndu bygging.

**Ad konto 14409 Klaksvíkar Sjómansskúli**

| Konto nr. | Kontonavn | Rokn-skapnr 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | 0,00 | ÷ 4,2 | ÷ 4,2 | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 175.247,06 | 196,0 | 215,0 | 215,0 | 215,0 | 215,0 |
| 103127 | Løn/lærarar | 307.425,44 | 440,0 | 440,0 | 440,0 | 440,0 | 440,0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 0,00 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 533,12 | 40,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 29.959,37 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 103288 | Løn/onnur | 0,00 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 103405 | Løn. útíðarløntir | 49.956,70 | 20,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 |
| 103509 | Samsýningar | 0,00 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| 113052 | Útiviðbót | 2.000,00 | 10,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur innanl. | 2.566,00 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 113243 | — — — — | 0,00 | 0,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| 203204 | Prenting | 0,00 | 5,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| 203308 | Lýsingar | 637,20 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 13.332,00 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 0,00 | 25,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 213503 | Umsitingar | 610,00 | 25,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 213607 | Stórri umbyggingar | 0,00 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 213702 | Ognartrygging | 4.255,00 | 7,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 0,00 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 20.862,00 | 25,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 233259 | Postgjald ..... | 1.662,32 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| 233354 | Telefon og telex ..... | 4.674,00 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 0,00 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp ..... | 0,00 | 2,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur .. | 0,00 | 9,2 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 14.643,10 | 20,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding .... | 2.692,81 | 10,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| 253107 | Kostur ..... | 45.146,01 | 85,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| 253306 | Amboð ..... | 58.780,00 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 8.561,68 | 60,0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| **4409** | | **741.533,81** | **1.355,0** | **1.299,8** | **1.300,0** | **1.300,0** | **1.300,0** |

Fyri árini 84/-85/86 vita vit ikki, hvat ið kemur at krevjast av næmingum okkara, og meta vit tí at skula leggja í minsta lagi 12% pr. ár av 1983/84 pr. ár. (Uppskot til fíggjarløgtingslóg 83/84).

---

**ad 14502 Føroya Fólkaháskúli**

Studningur til fólkaháskúlan verður veittur úr landskassanum sambært løgtingslóg nr. 101/78.

Harumframt fær Føroya Fólkaháskúli studning frá Tórshavnar Kommunu. Hinar útreiðslurnar verða goldnar við næmingagjaldinum, skeiðsgjøldum v.m.

Landskassin letur 100% til leiðaraløn, 50% til frálærutilfar og innbúgv, og allur annar studningur verður veittur við 70%. Sambært fíggjarlógaruppskot skúlans verður roknað við, at samlaðu útreiðslurnar fyri fíggjarárið 1983/84 verða 2.172.627 kr.

Landskassans partur býttur á tær ymsu kontiirnar verður:

| í 1000 kr. Konto | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot 1983/84 |
|---|---|---|---|---|
| 103558 | Eftirlønir ..... | 169.873 | 167.000 | 175.000 |
| 313111 | Rentustudningur ..... | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| 373051 | Næmingastudningur ..... | 209.450 | 336.000 | 420.000 |
| 373106 | Rakstrartilskot ..... | 978.496 | 755.226 | 1.107.439 |
| | **Landskassans partur** | **1.417.819** | **1.318.226** | **1.762.439** |

Sbrt. skriv dagf. 31. august 1982 frá Føroya Fólkaháskúla:

Hjálagt senda vit *uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1983/84*. Vegna ta serligu studningsskipan, ið háskúlin er undir, bar tað illa til at nýta tey skjøl (I og II), sum biðið varð um í leiðbeiningini frá Landsstýrinum, men hava vit sett tað upp so greitt sum gjørligt, býtt sundur í 4

1. Rakstrarstudningur
2. Byggistudningur
3. Eftirlønir
4. Næmingastudningur

1. Rakstrarstudningurin er gjølliga greinaður í hjálagda skjali. Viðmerkjast kann, at 1. aug. í ár er sett 1 lærarastarv afturat og 1 starv sum køksleiðari er umskipað til lærarastarv. Sum tað sæst av roknskapi, játtanum og reguleringsumsóknum hesi seinastu árini, hevur viðhvørt samsvarað rættiliga illa millum fíggjarlógaruppskotini og tær upphæddir, ið veruliga tørvur var á, m.a. tí at næmingatalið knappliga øktist, og tí at nógvar umvælingar hava ligið á láni í mong ár. Tí hava vit sett upp eitt heilt nýtt fíggjaruppskot, sum vit meina er heilt realistiskt — eisini fyri tey komandi tvey fíggjarárini.
2. Byggistudningurin er játtaður við 60.000 kr. um árið í 10 ár — fyrstu ferð útgoldin í 1977/78.
4. Næmingastudningurin kann verða upp til 70% av skúlagjaldinum, ið í løtuni er 1300 kr. um mánaðin. T.v.s. 40 næm. í 10 mánaðir á 1300 kr. = $40 \times 10 \times 1300 = 520.000$ kr. (70% er 364.000 kr.). Seinast varð roknað við 1200 kr./mð., komandi ár rokna vit við 1500 kr./mð., men tað er sjáldan, at allur stuðulin hevur verið útgoldin, tað veldst um næmingatalið, men gott er, at hann er tøkur.

Vit vilja fegin geva gjøllari frágreiðingar, um tað er neyðugt.

## Føroya Fólkaháskúli:

*Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1983/84:*

| | Roknskapur 81/82 | | Játtað 82/83 | Uppskot til játtan | 83/84 | 84/85 | 85/86 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Leiðaraløn ..... | 100% av 159.925 kr. = | 159.925 kr. | 000 | 100% av 177.000 = | 177.000 | 194.000 | 214.000 |
| Læraraløntir ..... | 70% av 614.642 kr. = | 430.249 kr. | 259.392 | 70% av 518.627 = | 363.039 | 400.000 | 400.000 |
| Yvirtíð ..... | | | | 70% av 105.000 = | 73.500 | 80.850 | 89.000 |
| Eykahjálp ..... | | | 71.484 | 70% av 125.000 = | 87.500 | 96.000 | 106.000 |
| Arbeiðsgent. ... | | | | | | | |
| Innbúgv ..... | 50% av 38.105 kr. = | 19.053 kr. | 30.000 | 50% av 40.000 = | 20.000 | 22.000 | 25.000 |
| Umvælingar .... | 70% av 165.453 kr. = | 115.816 kr. | 42.000 | 70% av 170.000 = | 119.000 | 130.900 | 144.000 |
| Frálærutilfar .... | 70% av 127.155 kr. = | 89.008 kr. | 42.000 | 70% av 120.000 = | 84.000 | 92.400 | 102.000 |
| Ljós/hiti ..... | 70% av 100.352 kr. = | 70.372 kr. | 63.000 | 70% av 110.000 = | 77.000 | 85.000 | 93.000 |
| Tryggingar ..... | 70% av 11.871 kr. = | 8.310 kr. | 5.250 | 70% av 12.000 = | 8.400 | 9.300 | 10.100 |
| Reingerð ..... | 70% av 6.683 kr. = | 4.678 kr. | 10.500 | 70% av 10.000 = | 7.000 | 7.700 | 8.500 |
| Aðrar útreiðslur: | | | | | | | |
| Skrivst.tele. ..... | 70% av 42.512 kr. = | 29.758 kr. | 21.000 | 70% av 40.000 = | 28.000 | 30.800 | 34.000 |
| (blaðhald.lýsing) | | | | | | | |
| Ymist ..... | 70% av 1.878 kr. = | 1.315 kr. | 0 | 70% av 5.000 = | 3.500 | 3.900 | 4.300 |
| Lærarar á skeið .. | | 0 kr. | 5.600 | 70% av 10.000 = | 7.000 | 7.700 | 8.500 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Reiðiútreiðslur . . | 70% av 71.445 kr. = | 50.012 kr. | 49.000 | 70% av 75.000 = | 52.500 | 58.000 | 64.000 |
| Rakstrarstudningur tilsamans ..... | | 978.496 kr. | 755.226 | | 1.107.439 | 1.218.550 | 1.342.400 |
| 2. Byggistudningur ..... | | 60.000 kr. | 60.000 | | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| 3. Eftirlønir (Marius & Jóhannes) ..... | | 169.873 kr. | 167.000 | | 175.000 | 192.500 | 212.000 |
| 4. Næmingastudningur ..... | | 209.450 kr. | 336.000 | | 420.000 | 460.000 | 500.000 |
| (Upp til 70% av næmingagjaldinum) .... | | (1100kr/mð) | (1200 kr/mð) | | (1500 kr/mð) | | |
| | | | **1.138.000** | | **1.762.439** | **1.931.000** | **2.114.400** |

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Uppskot landsstýrisins játtan 1983/84 1.762.000

Hervið verður sent skriv viðvíkjandi regulering til rakstrarroknskapin fyri fíggjarárið 1981/82.

| | Tøl, sambært hjálagda roknskap | Studningur, sambært løgtingslóg um fólkahásk. | |
|---|---|---|---|
| Skúlaleiðarin ..... | 159.925 kr. | 100% av 159.925 kr. = | 159.925 kr. |
| Aðrar lønir ..... | 614.642 kr. | 70% av 614.642 kr. = | 430.249 kr. |
| Frálærutilfar ..... | 127.155 kr. | 70% av 127.155 kr. = | 89.008 kr. |
| Innbúgv ..... | 38.105 kr. | 50% av 38.105 kr. = | 19.053 kr. |
| Umvælingar ..... | 165.452 kr. | 70% av 165.452 kr. = | 115.816 kr. |
| Ljós og hiti ..... | 100.532 kr. | 70% av 100.532 kr. = | 70.372 kr. |
| Trygging ..... | 11.871 kr. | 70% av 11.871 kr. = | 8.310 kr. |
| Annað: Skrivstovuútr. ... | 11.002 kr. | | |
| Telefon ..... | 18.554 kr. | | |
| Postgjald ..... | 1.426 kr. | | |
| Reingerðevni .... | 6.683 kr. | | |
| Lýsingar, blaðhald og annað ... | 13.408 kr. | 70% av 51.073 kr. = | 35.751 kr. |
| Rentuútreiðslur ..... | 71.445 kr. | 70% av 71.445 kr. = | 50.012 kr. |
| Eftirlønir ..... | 169.873 kr. | 100% av 169.873 kr. = | 169.873 kr. |
| Byggistudningur ..... | | | 60.000 kr. |
| Sambært løgtingslóg um fólkahásk. áttu vit at fingið ..... | | | 1.208.369 kr. |
| Vit hava fingið: Rakstrarstudning ..... | | 781.000 kr. | |
| Eftirlønir ..... | | 219.000 kr. | |
| Byggistudningur ..... | | 60.000 kr. | 1.060.000 kr. |
| **Munur at útgjalda okkum** ..... | | | **148.369 kr.** |

Hjálagdur er roknskapur fyri 1981/82.

**Viðmerkingar:**
Hækkingarnar í mun til játtanina stava einamest frá príshækkingum, men vit hava eisini havt hækkingar í lønarútreiðslum, sum stava frá sjúkrafríloyvi hjá einum lærara í 9 mánaðir og frá øktum næmingatali. Tað økta næmingatalið hetta seinasta árið hevur eisini givið øktar útreiðslur til frálærutilfar (útferðir o.a.). Ein partur av hækkingini á hesum seinasta stavar frá tí, at landsstýrið avtók fríferðirnar við Strandferðsluni.

Av eykaútreiðslum til umvælingar er at nevna ein stór umvæling av hitaverkinum í vetur, sum kom rættiliga óvart á okkum.

Rakstrarvinningurin stavar í stóran mun frá reguleringunum fyri tey bæði undanfarnu fíggjarárini og frá eykainntøkum, vit hava fingið við skeiðvirksemi. Hesin rakstrarvinningur er saman við rakstrarvinninginum tey bæði undanfarnu árini ætlaður til fríðkan av økinum uttan um skúlan: laða garðar, gera grasvøll, seta niður trø, gera parkeringsøki o.s.fr. Tað arbeiði er mett at kosta umleið 400.000 kr.

Vinarliga
háskúlans vegna
Thorben Johannesen

PS: Viðv. sjúkrafríloyvi í 9 mánaðir til ein av lærarunum: Vit søktu í brævi 13.09.81 um at fáa eina eykajáttan: 70% av 85.000 kr. = 59.500 kr. til vikarløn. Henda meirútreiðsla er viðroknað í hesi reguleringsumsókn, tí fellur nevnda umsókn frá 13.09.81 hervið burtur.

---

**ad 14554 Húsarhaldsskúlar**
Studningur til Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík verður veittur eftir løgtingslóg nr. 47/76.

Studningurin er uml. 70-80% av øllum útreiðslunum. Landskassin veitir ikki studning til mat, men ber allar útreiðslur til løn skúlaleiðarans og 70% av øðrum útreiðslum.

Landskassans partur:

| | |
|---|---|
| R 81/82: | 351 |
| J 82/83: | 523 |
| U 83/84: | 430 |

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Uppskot landsstýrisins játtan 430.000 kr.

---

**Ad konto 14554 Húsarhaldsskúlin, Klaksvík:**
Sbrt. skriv dagf. 2. sept. 1982:

**Fíggjarætlan 1983/84**

| | | |
|---|---|---|
| matur | kr. | 61.200,00 |
| leiga av undirv. hølum | | 86.900,00 |
| olja | — | 58.000,00 |
| ravmagn | — | 27.000,00 |
| hjálpilærarar | — | 48.400,00 |
| viðlíkahald | — | 53.700,00 |
| telefon | — | 7.000,00 |
| skrivstovuhald v.m. | — | 16.000,00 |
| tryggingar | — | 4.500,00 |
| renta | — | 41.400,00 |
| ymist | — | 6.700,00 |
| skúlaleiðarin | — | 170.000,00 |
| | | **kr. 580.800,00** |

Føroya Landsstýri at gjalda:

| | | | |
|---|---|---|---|
| leiga av undirv. hølum | kr. | 86.900,00 | |
| olja | — | 58.000,00 | |
| ravmagn | — | 27.000,00 | |
| hjálpilærarar | — | 48.400,00 | |
| viðlíkahald | — | 53.700,00 | |
| telefon | — | 7.000,00 | |
| skrivstovuhald v.m. | — | 16.000,00 | |
| tryggingar | — | 4.500,00 | |
| renta | — | 41.400,00 | |
| ymist | — | 6.700,00 | |
| 70% av | kr. | 349.600,00 | kr. 244.720,00 |
| skúlaleiðarin | | | 170.000,00 |
| eftirstøða 1981 | | | |
| kr. 171.622,60 ÷ kr. 156.230,90 | | | 15.391,70 |
| | | | **kr. 430.111,70** |

Fíggjarætlanin fyri 1984/85 og 1985/86 kemur at hava somu upphæddir í 1983/84 príslegu, treytað av at næmingatalið ikki økist.

---

**Ad konto 14604 Kvøldskúlar**

Sambært galdandi lóggávu verða útreiðslurnar til kvøldskúlan goldnar soleiðis:

Ríkis- og landskassin gjalda 70% av læraralønum og neyðugum flutningi av lærarum. Restin, 30%, verður goldin av avvarðandi kommunum. Av hesum 70% letur ríkiskassin 2/3 og landskassin 1/3.

Í skúlaárinum 1980/81 vóru nýttir uml. 39.000 tímar til kvøldskúlaundirvísing, og í 1981/82 er roknað við, at nýtslan var uml. 46.000 tímar. Sambært tær umsóknir, sum Landsskúlafyrisitingin hevur fingið til kvøldskúlaundirvísing fyri skúlaárið 1982/83, verður roknað við, at nýtslan í 83/84 verður uml. 55.000 tímar. Í hesar 55.000 tímarnar er ikki íroknað nakrir tímar til Lista- og Handverkaskúlan á Sandi.

Samlaðu útreiðslurnar til kvøldskúlaundirvísing í fíggjarárinum 1981/82 vóru uml. 5,5 mió. kr.

Omanfyri nevnda meting er gjørd við støði í núgaldandi lóggávu, og tí er ikki tikin við ein møgulig hækking, ið er at vænta, um so er, at frítíðarlógin verður nútímansgjørd eftir teimum stevnumiðum, sum nevnd eru í rammulógini um frítíðarundirvísing v.m.

Roknað verður við, at útreiðslurnar, íroknað lærarakoyring, verða 6,7 mió. kr.

R 81/82: 5.456
J 82/83: 5.398
U 83/84: 6.700

---

**Rakstrarstað nr. 14656: Landsmiðstøð fyri undirvísingarambоð í 1000 kr.**

| Konto | Navn | Rokn-skapur 1981/99 | Játtan 1982/83 | Uppskot 1983/84 | Figgjar-meting 1984/85 | Figgjar-meting 1985/86 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøka ..... | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 0 | 0 | 116,25 | 155,0 | 300,0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk .... | 0 | 0 | 168,75 | 225,0 | 335,0 |
| 103222 | Løn/reingerð ..... | 0 | 0 | 50,4 | 56,0 | 56,0 |
| 103405 | Úrtíðarlønir ..... | 0 | 0 | 5,0 | 6,6 | 6,6 |
| 103509 | Samsýningar ..... | 0 | 0 | 7,5 | 10,0 | 10,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpening. | 0 | 0 | 6,0 | 8,0 | 8,0 |
| 203204 | Prenting ..... | 0 | 0 | 112,5 | 150,0 | 200,0 |
| 203308 | Lýsingar ..... | 0 | 0 | 6,0 | 8,0 | 10,0 |
| 213105 | El, hiti og vask .... | 0 | 0 | 15,0 | 20,0 | 20,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ... | 0 | 0 | 103,5 | 138,0 | 138,0 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 0 | 0 | 50,0 | 25,0 | 25,0 |
| 233259 | Postgjald ..... | 0 | 0 | 15,0 | 20,0 | 20,0 |
| 233354 | Telefon og telex ... | 0 | 0 | 7,2 | 9,6 | 9,6 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 0 | 0 | 18,0 | 24,0 | 24,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovu-útreiðslur ..... | 0 | 0 | 27,0 | 36,0 | 36,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding ..... | 0 | 0 | 650,0 | 700,0 | 800,0 |
| | **Tilsamans** | | | **1.358,1** | **1.591,2** | **1.998,8** |
| | Landskassans partur: | | | 1.184.163,00 | 1.395.950 | 1.723.800 |
| | Ríkiskassans partur: konto 103048 | | | 63.937,50 | 85.250 | 165.000 |
| | konto 253085 | | | 110.000,00 | 110.000 | 110.000 |
| | Kommunanna partur: | | | | | |

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
1.358.100 kr. til Landsmiðstøð fyri undirvísingarambоð verður ikki játtað.

*Viðmerkingar til § 14 - 14656*

**Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo**

Eftir §25, 4. stk. í løgtingslóg um fólkaskúlan, lóg nr. 21 frá 22. mars 1979, eigur at verða sett á stovn ein landsmiðstøð fyri undirvísingarverkið.

Landsstýrið setti í desember 1979 eina nevnd til at gera reglur um skúlabókasøvn og landsmiðstøð, og handaði nevndin landsstýrinum álit í málinum 4. juni 1981.

Við støði í hesum áliti hevur Landsskúlafyrisitingin gjørt uppskot til kunngerð um landsmiðstøð fyri undirvísingarambo og um skúlabókasøvn, sum aftaná at hava verið góðkent av Landsskúlaráðnum varð sent landsstýrinum 10. juli 1982.

Landsstýrið sendi 12. juli 1982 fyrisitingini uppskotini aftur við tí viðmerking, at áðrenn landsstýrið kundi taka støðu til uppskotini, var Landsskúlafyrisitingin biðin um:

1. at senda Kommunufelag Føroya kunngerðina um skúlabókasøvn til ummælis
2. at kanna, um ríkiskassin eftir galdandi reglum kemur at luttaka í útreiðslunum til landsmiðstøðina
3. at gera uppskot til komandi løgtingsfíggjarlóg um fíggjarætlan fyri landsmiðstøðina at byrja 1. august 1983
4. at gera avtalu við Føroya Skúlasavn, at landsmiðstøðin yvirtekur ognir tess pr. 1. august 1983, samstundis sum savnið heldur uppat
5. at greiða frá, hvørja støðu skúlabókagrunnurin fær undir nýskipanini.

Við støði í hesi áheitan pkt. 3 hevur Landsskúlafyrisitingin gjørt fylgjandi uppskot til fíggjarætlan fyri landsmiðstøðina.

Í uppskotinum til kunngerð stendur, at landsmiðstøðin skal vera partur av Landsskúlafyrisitingini, sum stendur undir §11 á løgtingsfíggjarlógini, meðan hetta uppskotið til fíggjarætlan fyri landsmiðstøðina er sett undir §14 Undirvísingarmál. Ætlanin er framvegis, at landsmiðstøðin skal virka beinleiðis undir Landsskúlafyrisitingini, men um kontoin hjá Landsskúlafyrisitingini var hækkað við upphæddini til landsmiðstøðina, verður mett, at tað hevði verið torført at funnið út av, hvat var hvat í framtíðini, og er tað tí gjørt á henda hátt. Viðmerkjast kann, at eftir álitinum vóru starvsfólk og aðrar fyrisitingarligar útreiðslur ætlaðar at vera saman við Landsskúlafyrisitingini, meðan søvnini vóru á § 14.

**Viðmerkingar til tær einstøku konti**
Øll tøl fyri fíggjarárið 1983/84 eru roknað við støði í, at miðstøðin byrjar 1. august 1983, og er sostatt 1/4 av fíggjarárinum farið tá.

*Ad 103048 Løn/tænastumenn*
Eftir uppskotinum til kunngerð verður settur ein leiðari av landsmiðstøðini. Eftir uppskotinum her verður roknað við, at leiðarin verður lærari við grundgávu í tænastumannalógini, og verður hesin ætlandi løntur í lønarstigunum 27 – lærarafelagslógini. Sostatt verður leiðarin løntur av læraralønarsamtonni, herav ríkiskassin skal gjalda 55%. Seinni verður helst neyðugt við konsulenthjálp frá lærarum, og er hendan útreiðslan tikin við í fíggjarmeting fyri 1985/86.

*Ad 103143 Løn starvsfólk*
Tað verður, beinanvegin landsmiðstøðin fer undir virksemi, neyðugt við einum skrivstovufólki og einum fólki við bókasavnsútbúgving. Væntandi verður, so hvørt sum miðstøðin verður útbygd, neyðugt við fleiri skrivstovufólkum og tí eitt afturat sett í meitingina fyri 1985/86.

*Ad 103222 Løn/reingerð*
Útreiðslur til reingerð eru settar til kr. 50.400, og er hølið sett til 250 m².

*Ad 103405 Útiðarlønir*
Tað er torført at meta um støddina á hesi konto, men verður mett, at ein ávís upphædd eigur at verða sett av.

*Ad 113202 Ferða- og dagpeningur*
Landsmiðstøðin skal vera ráðgevari hjá skúlabókasavnunum kring landið, og má tí metast, at nakað av ferðing verður.

*Ad 203204 Prenting*
Roknast má við, at Landsmiðstøðin, við tað at hon ersatt kal fram leiða tilfar, fær rættiliga stórar útreiðslur til prenting.

*Ad 213806 Leigutreiðslur*
Tað verður roknað við, at landsmiðstøðin, tá hon er fult uthygd, kemur at hava ein hølistørv uppá 250 til 300 m², og kostat hetta eftir

dagsprísinum kr. 460 pr. m². Upphæddin, sum er sett her, svarar til 300 m². Møguliga er møguleiki fyri at leiga frá Svend Krosstein, sama stað sum Landsskúlafyrisitingin hevur leigað, og er hvør sektión har 146 m² til støddar.

*Ad 233051 Innbúgv*
Neyðugt verður við skrivstovuinnbúgvi, sum í fyrstu syftu er sett til at kosta kr. 50.000, í komandi árum kr. 25.000.

*Ad 233409 Leiga av maskinum*
Tað verður her hugsað um kopimaskinu. Seinni verður óivað neyðugt við øðrum maskinum, annaðhvørt at leiga ella at keypa og tá á konto 233561.

*Ad 253085 Bókakeyp og innbinding*
Í álitinum verður roknað við, at árliga útreiðslan til søvn verður kr. 550.000, og hevur Landsskúlafyrisitingin, við vanligum prísvøkstri í huga, sett upphæddina til kr. 650.000 fyrsta árið og hækkað tað nakað fyri komandi ár, til miðstøðin er fult útbygd. Havast skal í huga, at miðstøðin eisini umfatar AV-tól, sum eru dýr at keypa.

---

**Skúlin á Tróðni**
Ríkið rindar 75% av útreiðslunum og landið 25%. Landskassans útreiðslur í 3 ára skeiðnum verða í 1000 kr.:

| | |
|---|---|
| R 81/82: | 2.054 |
| J 82/83: | 2.117 |
| U 83/84: | 2.430 |

**Viðmerkingar til konti, hvørs útreiðslur landskassin ikki luttekur í**

*Føroya Læraraskúli*
Allar útreiðslur til læraraskúlan verða goldnar av ríkiskassanum. Tó skal viðmerkjast, at frá fíggjarárinum 1983/84 at rokna fer ein vaksandi partur av útreiðslunum til prøvtøkur at verða goldin av Landsskúlafyrisitingini, konto 233529.

*Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir:*
Ríkiskassin rindar 50% av útreiðslunum á hesi konto.
Landskassans partur í 1000 kr.:

| | |
|---|---|
| R 81/82: | 16 |
| J 82/83: | 18 |
| U 83/84: | 26 |

*Tekniskir skúlar*
Henda konto fevnir um teknisku skúlarnar í Tórshavn og Klaksvík og somuleiðis um skúlaheimini í hesum støðum.

Undirvísingarmálaráðið, Direktoratet for erhvervsuddannelsen, hevur higartil staðið fyri hesum skúlum. Útreiðslurnar til skúlarnar verða býttar sambært reglunum í fyriskipan nr. 518, dagfest 23. september 1977. Ríkið rindar 50% í rakstrarstudningi til lærlingaundirvísingina og kommununrnar 20%. Ríkið rindar 100% í studningi til prógtøkuundirvísingina.

Av teimum samlaðu útreiðslunum rindar ríkið o.u. 85%, kommununar o.u. 10%. Tað, ið eftir er, o.u. 5%, verður fyrst og fremst rindað sum uppihaldsútreiðslur fyri lærlingar.

Landskassin veitir ikki studning til teir teknisku skúlarnar.

*Handilsskúlar*
Hesin skúlin fær studning eftir somu reglum sum teknisku skúlarnir, og útreiðslurnar verða býttar á sama hátt.

Landskassin veitir ikki studning til handilsskúlan, men frá 1983 má roknast við, at Landsskúlafyrisitingin skal bera nakað av prógtøkuútreiðslunum av konto 233529.

*Føroya Maskinskúli*
Ríkiskassin ber allar útreiðslurnar.

*Privatir skúlar*
Teir privatu skúlarnir fáa, sambært fíggjarnevndarinnar avgerð 1952, studning frá ríkinum uppá 85% av læraralønunum. Harumframt veitir Tórshavnar Kommuna eitt minni tilskot. Studningur verður ikki veittur úr Landskassanum.

Aðrar útreiðslur verða goldnar við næmingagjaldi og tilskoti frá privatum.

**Ad § 14 - 14901 Ítróttasamband Føroya**
Sbrt. skriv dagf. 19. okt. 1982:

*Umsókn til fíggjarlógina*
Hjálagt senda vit fíggjarætlanir fyri sersambondini, deildirnar og felagsraksturin hjá Í.S.F.

Út frá hesum fíggjarætlanum sæst, at eginfíggjanin í 1983-84 er upp á kr. 584.000,-, og at studningstørvurin er upp á *kr. 2.282.000,-*. Henda tørv vilja vit søkja háttvirda landsstýri og løgting um at veita okkum.

Tørvurin á stuðli hevur ongantíð verið so stórur sum í ár, og kemst tað m.a. av:

1. hækking í ferða- og uppihaldsútreiðslum.
2. stórum aktiviteti uttanlands í komandi fíggjarári,
3. vit eru ógvuliga hart spentir fíggjarliga av uppíbyggjanini av Í.S.F.-húsinum
4. studningsveitanin frá A/S Danair uppá ferðaseðlar er dottin burtur,
5. upprættan av nýggjum ítróttagreinum, frælsan ítrótt og súkkling,
6. arbeiði viðv. alheimsviðurkenning av fótbólti og fimleiki,
7. fleiri stórum ítróttastevnum í Føroyum komandi ár, harímillum norðurlendskari unglinga hondbóltskapping, sum kemur at fara fram í Klaksvík, á Skálafjørðinum og í Havn.

Ítróttasamband Føroya loyvir sær eina ferð enn at skjóta upp fyri landsstýrinum at fáa gongd á og umhugsa møguleikan fyri at seta í verk eina føroyska tipping, hvørs ágóði verður lutaður Í.S.F. og ítróttafeløgunum.

Hjálagt senda vit eitt bókling, sum inniheldur yvirlit yvir Í.S.F.-organisatiónina og øll ítróttafeløgini í Føroyum. Upplýsast skal, at tað eru 79 feløg og 8.688 iðkandi limir í Í.S.F. í løtuni. Alt hetta ungdómsarbeiði runt Føroya land verður gjørt í frítíðini og er ólønt, hetta vóna vit, at landsstýri og løgting hava í huganum, nú fíggjarætlanin verður løgd.

Vónandi verður tikið væl undir við hesum uppskoti hjá okkum, men eru ivaspurningar, eru vit altíð til reiðar at samráðast um hetta.

Sbrt. skriv dagf. 21. oktober 1982:

Hjálagt senda vit uppískoyti til fíggjarætlanina hjá Ítróttasambandinum. Hetta kemur undir Ungdóms- og Menningardeildina.

Arbeiðsskrá Ungdóms- og Menningardeildarinnar komandi árini verður ætlandi henda:

*1983/84*

| | |
|---|---|
| Grundskeið (donsk leiðsla) | kr. 10.000,- |
| Alm. leiðaraskeið (fø. leiðsla) | kr. 5.000,- |
| Alm. instruktørskeið (fø. leiðsla) | kr. 5.000,- |
| Ungdómslega (Skift verður hvørt ár millum ymisku Norðurl.) | kr. 15.000,- |
| Norðurlendskur fundur | kr. 5.000,- |

*1984/85*

| | |
|---|---|
| Grundskeið (fø. leiðsla) | kr. 6.000,- |
| Alm. instruktørskeið (fø. leiðsla) | kr. 6.000,- |
| Ítróttapsykologiskeið (do. leiðsla) | kr. 12.000,- |
| Ungdómslega | kr. 20.000,- |
| Norðurlendskur fundur | kr. 6.000,- |

*1985/86*

| | |
|---|---|
| Grundskeið (fø. leiðsla) | kr. 7.000,- |
| Alm. leiðaraskeið (fø. leiðsla) | kr. 7.000,- |
| Ítróttapsykologiskeið (do. leiðsla) | kr. 14.000,- |
| Ungdómslega | kr. 25.000,- |
| Norðurlendskur fundur | kr. 7.000,- |

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Játtaðar verða 1.250.000 kr. til ÍSF, sum felagið sjálvt skal býta millum deildirnar.

---

**Ad §14 - 14953/313152 Grunnur til lærdan lestur**
Sbrt. skriv dagf. 20. nov. 1982:

*Umsókn til fíggjarløgtingslóg fyri 1983/84, 1984/85 og 1985/86.*
*§ 2295 31.1 Grunnurin til lærdan lestur.*
Fráfarandi ráð í MFS setti sær sum eitt mál at fáa umsitingina av grunninum í rætt lag, soleiðis at limirnir kundu taka stuðulin fyri fult.

Hetta mál kann partvíst sigast at vera nátt, við tað at Føroya Landsstýri eftir áheitan gav eina eykajáttan, soleiðis at lánið gjørdist umleið eins stórt í ár sum í fjør, nevniliga kr. 4.000,- til tann einstaka.

Ráðið og limirnir vænta tí, at hetta verður gongdin í framtíðini, og heita á landsstýrið um, at lestrarlánið fyri 1982/83 verður 4.500 + prístalsviðbøtur (t.e. 5.000 kr.) til hvønn einstakan umsøkjara. Fyri 3 tey komandi árini kundu vit hugsað okkum roknistykkið solciðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1983/84 | 250 umsóknir á kr. 5.700 | = | kr. 1.425.000 |
| 1984/85 | 270 — á — 6.400 | = | kr. 1.728.000 |
| 1985/86 | 290 — á — 7.200 | = | kr. 2.088.000 |

Uppskot felagsins til lestrarlán
§*22 31.15*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1983/84 | 250 umsóknir á kr. 5.700 | = | kr. 1.425.000 |
| 1984/85 | 270 — á — 6.400 | = | kr. 1.728.000 |
| 1985/86 | 290 — á — 7.200 | = | kr. 2.088.000 |

Umsókn felagsins um studning til rakstur og til styttri lestrarferðir

---

Viðmerking frá landsstýrinum:
Játtaðar verða 880.000 kr. á konto 14953/313152 Grunnurin til lærdan lestur.

---

**Ad §14-14953/313351 Næmingastudningur til listafólk**
Sbrt. skriv dagf. 29. september 1982:

Rakstrarstað 14953/313351: Næmingastudningur til listafólk.

Upphæddin 1982/83: 30.000 kr.
Mælt verður til, at studningurin í 1983/84 verður 35.000 kr. Sama tilmæli er fyri 1984/85 og 1985/86.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Landsstýrið skjýtur upp at játta 1983/84 35.000 kr.

---

**Ad § 14-14953/313368 Føroya skúlasavn**
Sbrt. skriv dagf. 27. sept. 1982:

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84 viðvíkjandi rakstrarstaði 14953/313368 Føroya Skúlasavn.

Skotið verður upp, at studningurin verður kr. 80.000.

Grannskoðaður roknskapur fyri seinasta fíggjarár verður sendur.

Viðvíkjandi ætlan fyri 1984/85 og 1985/86 er at siga, at eftir nýggju lógini fyri fólkaskúlan eigur »Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð at verða sett á stovn«, og tá einaferð verður farið undir tað, verður talan um væl størri upphæddir.

Føroya Skúlasavn eigur at halda fram við virksemi sínum, til »Landsmiðstøðin« er sett á stovn.

Høglisviðurskifti o.a. gera, at hetta virksemi ikki kann vaksa nakað munandi, og eg kundi tí sum eina leysa ætlan fyri 1984/85 sett kr. 90.000 og fyri 1985/86 kr. 100.000.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Landsstýrið skjýtur upp at játta fyri 1983/84 70.000 kr.

---

**Ad § 14-14953/313376 Meginfelag Føroyskra Studenta**
*1. Rakstur*
Sum lesast kann av roknskapinum fyri árið 82/83, hevur felagið fingið útgoldið kr. 55.000 til raksturin. Hetta av tí munandi økta aktivitetinum. Skrivstovukvinnan er sett til 10 tímar um mánaðin, meginfelagstíðindi er útkomið, og PISAN (lestrarhondbókin til studentar og HF'arar) er útgivin. Mett verður, at Pisan kemur út aftur í 1984/85, men annars verður gongdin hin sama. Tó skal nevnast, at MFS letur upp skrivstovu í Føroyum, og at ætlanin er at seta ferðaskrivara.

| Inntøkur | 1983/84 | 1984/85 | 1985/86 |
|---|---|---|---|
| Limagjald ..... | kr. 8.500 | kr. 9.000 | kr. 9.700 |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Skrivstukvinna ..... | kr. 11.200 | kr. 12.600 | kr. 14.200 |
| Porto ..... | — 3.500 | — 3.900 | — 4.400 |
| Húsaleiga ..... | — 8.500 | — 9.100 | — 10.300 |
| Meginfelagstíðindi .... | — 7.800 | — 8.700 | — 9.800 |
| Fundir ..... | — 6.100 | — 6.800 | — 7.700 |
| PISAN ..... | — | — 15.000 | — |
| Telefon ..... | — 4.500 | — 5.100 | — 5.700 |
| Internationalir fundir .. | — 5.600 | — 6.300 | — 7.100 |
| | **kr. 46.800** | **kr. 67.500** | **kr. 59.200** |

Netto kemur felagnum at resta í fyri:
1983/84 kr. 38.300
1984/85 kr. 58.500
1985/86 kr. 49.500

*2. Stuðul til styttri lestrarferðir*
Sum roknskapur felagsins vísir, so hava limirnir víst stóran áhuga fyri at fáa stuðul til styttri lestrarferðir.

Í ár eru umsóknirnar næstan tvífaldaðar, og hevur hetta ført við sær, at tann samlaða stuðulsupphæddin er tvífaldað til umleið kr. 50.000. Úrslitið er, at tað í dag bert er peningur til umleið 5-10 umsóknir. Stuðulin er ein fyritreyt fyri, at føroysk lesandi í (Danmark) útlandinum hava møguleika at granska føroysk viðurskifti, gransking, sum føroyska samfelagið avgerandi hevur brúk fyri.

Tí verður skotið upp, at stuðulin fyri komandi árini verður:
1983/84 kr. 51.500
1984/85 kr. 58.000
1985/86 kr. 65.000

Viðmerkjast skal, at her er bert talan um prístalsviðbøtur (12,5% árliga) og *ikki* um eina veruliga øking av stuðlinum. Tað vil siga, at MFS hevur fylgt áheitanini frá Føroya Landsstýri um at vísa sparsemi.

*§2295 31.37*

| | |
|---|---|
| 1983/84 ..... | kr. 89.800 |
| 1984/85 ..... | kr. 116.500 |
| 1985/86 ..... | kr. 114.500 |

---

Viðmerking frá landsstýrinum:
Játtaðar verðr 85.000 kr. til rakstur av MFS og MFÚ.

---

**Ad §14-313384 Norrøna Felagið**
Sbrt. skriv dagf. 10. oktober 1982:

Fíggjaruppskotið fyri Norrøna Felagið í Føroyum, rakstrarstað §14-2290/3138:

Felagið loyvir sær at biðja um, at studningurin 1983/84 verður kr. 25.000,-, sum hann er í løtuni, + 12 1/2% = **kr. 28.225,-.**

Grannskoðaður roknskapur fyri 1981 er sendur landsskrivstovuni í apríl 1982.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Játtanin fyri 1983/84 er 25.000 kr.

---

**Ad §14-14953/313406 Studningur til fremmand, ið lesa í Føroyum**
Sbrt. skriv dagf. 5. oktober 1982 frá Fróðskaparsetri Føroya:

*Umsókn um hækkan av játtan á rakstrarstað 14953 konto 313406*
Vit loyva okkum við hesum at søkja um, at játtanin til studning til námsferðir til Føroya verður hækkað úr 20.000 kr. til 25.000 kr.

Sum tað sæst á hjálagda yvirliti, hevur talið á umsøkjarum um studning til námsferðir til Føroya verið rættiliga stórt hesi seinastu árini. Tá ið hugsað verður um, hvussu stórar ferðaútreiðslurnar eru, er greitt, at 20.000 kr. muna ikki nógv, um tær skulu býtast sundur millum øll tey, sum lúka treytirnar fyri at fáa studning, og sum mugu haldast at fáa gagn burtur úr eini námsferð til Føroya, ikki bert fyri

tey sjálvi, men eisini fyri Fróðskaparsetrið og aðrar stovnar á Debesartrøð.

Hiðani verður kravt, at allar rannsóknir, sum studningur verður latin til, fara fram í samstarvi við Fróðskaparsetrið ella hinar stovnarnar, og at úrslitið av rannsóknunum verður latið setrinum til varðveitslu. Á henda hátt hava vit fingið nógv virðismikið tilfar, og samstundis hava vit møguleika fyri eini ávísari stýring av ið hvussu er einum parti av útlendskum rannsóknum í Føroyum. Hetta seinasta meta vit av stórum týdningi.

Eisini skal verða nevnt, at Fróðskaparsetrið hevur avtalu við Odense Universitet og Aalborg Universitetscenter, hareftir setrið hevur átikið sær í ávísan mun at stuðla rannsóknum, teirra fólk gera í Føroyum, annaðhvørt fakliga ella fíggjarliga. Einasti møguleiki vit hava at veita fíggjarligan stuðul, er játtanin til námsferðir til Føroya.

**Yvirlit yvir umsøkjarar til studning til námsferðir til Føroya**

| Ár | Tal á umsøkjarum | Tal á teimum, ið hava fingið játtað studning | Londini, haðan tey eru |
|---|---|---|---|
| 1973/74 | 19 | 6 | Noreg, Bretland (3), Ísland |
| 1974/75 | 20 | 10 | Svøríki (4), Danmark (3), Bretland (3) |
| 1975/76 | 18 | 6 | Bretland (3), Danmark (2), Noregi, Svøríki |
| 1976/77 | 22 | 8 | Bretland, Danmark (5), Svøríki, Ísland |
| 1977/78 | 18 | 7 | Danmark (3), Føroyar, Bretland, Svøríki, Noreg |
| 1978/79 | 20 | 7 | Føroyar, Danmark (6) |
| 1979/80 | 17 | 7 | Bretland, Ísland, Danmark (5) |
| 1980/81 | 20 | 8 | Noreg (2), Danmark (5), USA (1) |
| 1981/82 | 19 | 7 | Noreg (2), Danmark (2), Bretland (2), Háland (1) |
| 1982/83 | 15 | 5 | Bretland (3), Danmark, Finland |

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Játtaðar verða 25.000 kr. í 1983/84.

**Ad § 15-15109: Føroya Landsbókasavn**
Sbrt. skriv dagf. 28. sept. 1982:

Niðanfyri standandi uppskot til fíggjarætlan hjá Føroya Landsbókasavni fyri 1983/84 verður við hesum sent Landsstýrinum við viðmerkingum og neyðturviligum upplýsingum, somuleiðis ein ætlan fyri 1984/85 og 1985/86.

| Kontonummar og -navn | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 84/85 í 1000 kr. | Ætlan 84/85 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 183.2 | 189.0 | 198.9 | 198,9 | 198,9 | 198,9 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 696.4 | 960.6 | 1.152.8 | 1.152,8 | 1.152,8 | 1.152,8 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 213.6 | 230.9 | 235.0 | 235,0 | 235,0 | 235,0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 85.6 | 90.0 | 96.2 | 96,2 | 96,2 | 96,2 |
| 103288 | Løn/onnur | 106.6 | 75.0 | 44.0 | 44,0 | 44,0 | 44,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpening innanlands | | | 1.0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| 113243 | Ferða- og dagpening uttanlands | | | 6.0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| 133053 | Fólkatrygging | 1.7 | 3.0 | 4.0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 138.5 | 200.5 | 204.0 | 204,0 | 204,0 | 204,0 |
| 213503 | Umsiting | 13.5 | 13.0 | 18.0 | 18,0 | 18,0 | 18,0 |
| 213702 | Ognartrygging | 23.0 | 26.0 | 26.0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| 223404 | Flutningur | 4.7 | 8.0 | 8.0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| 233051 | Innbúgv | 10.8 | 35.0 | 35.0 | 35,0 | 35,0 | 35,0 |
| 233155 | Prentlutir | 14.9 | 16.0 | 16.0 | 16,0 | 16,0 | 16,0 |
| 233259 | Postgjald | 10.6 | 13.0 | 13.0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 8.7 | 20.0 | 20.0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 16.6 | 18.2 | 29.8 | 29,8 | 29,8 | 29,8 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 12.8 | 17.0 | 18.0 | 18,0 | 18,0 | 18,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 233.0 | 300.0 | 330.0 | 360,0 | 360,0 | 360,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 4.0 | 5.8 | 5.8 | 6,3 | 6,3 | 6,3 |
| | **Tilsamans** | **1.737.4** | **2.221.0** | **2.461.5** | **2.492,0** | **2.492,0** | **2.492,0** |

**Viðmerkingar:**

*103048 Løn/tænastumenn*

| | | |
|---|---|---|
| Landsbókavørðurin verður løntur í 31. lønarflokki. | | |
| Løn juli 1982: 15.816,42 kr. × 12 ..... | 189.8 | |
| 5 dýrtíðarviðbøtur á 105 kr. ..... | 6.3 | |
| 1,5% ..... | 2.8 | 198.9 |

*103143 Løn/starvsfólk*
Roknað er við lønini pr. 1.7.1982 + 5 dýrtíðarviðbótum á 105 kr. + 1,5% frítíðarløn.

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) 1 fyrsti bókavørður | 18. lønarfl. | 3. st. | 150.4 |
| b) 1 bókavørður | 20. lønarfl. | 9. st. (30/42) | 120.4 |
| c) 1 bókavørður | 15. lønarfl. | 5. st. | 144.9 |
| d) 1 bókavørður | 15. lønarfl. | 4. st. | 143.2 |

Frá 1.10.82 í staðin fyri normerað hjálparfólkastarv og partar, ið vóru leysir í sambandi við niðursetta starvstíð. Skriv 18.6.82.

| | | | |
|---|---|---|---|
| e) 1 skrivari | 12. lønarfl. | 8. st. (37/42) | 122.7 |
| f) 1 hjálparfólk | 12. lønarfl. | 12. st. (37/42) | 130.2 |
| g) 1 hjálparfólk | 9. lønarfl. | 12. st. | 135.8 |
| h) 1 hjálparfólk | 9. lønarfl. | 11. st. | 132.9 |
| i) 1 bókbind./konservator | 15. lønarfl. | (1/2 dag) | 72.3 |

Skriv 20.10.81 um setan av bókbindara/konservatori við bókasavnið og skjalasavnið í felag. Ynskið verður við hesum tikið uppaftur.

1.152.8

*103168 Løn/sáttmálaløn*
Vísindabókavørðurin er løntur eftir sáttmála við donsku Magisterforeningen. Løn juli 1982: 18.757,50 ..... 235.0

*103222 Løn/reingerð*

| | |
|---|---|
| 2 fólk á 60 t. á 51,41 kr. = 6.181.20 kr. um mán. ..... | 74.2 |
| 9,5% frítíðarløn ..... | 7.0 |
| mett lønarhækking ..... | 3.8 |
| høvuðsreingerð, avloysarar, vindeygavask ..... | 11.2 |
| | 96.2 |

*103288 Løn/onnur*
Meirnýtslan stendst av, at normerað størv hava verið ósett, og tímalønt fólk hevur ímeðan røkt størvini. Brúkið hevur verið tilsvarandi minni á konto 103143.

| | |
|---|---|
| Frítíðaravloysarar og onnur eykahjálp ..... | 28.4 |
| Húsavørður hevur ikki fingist, goldið verður tí eyka ..... | 7.2 |
| Annað bønarmansarbeiði, sláa grasvøll, urtagarðsarb. v.m. | 8.4 |
| | 44.0 |

Víst verður eisini til fíggjarætlan fyri rakstrarstað nr. 15793: Stovnar á Debesartrøð

*113202 & 113243 Ferða- og dagpeningur*
Hevur ikki áður verið sundurgreind og bókað fyri seg, samb. skriv frá 6.5.82

*213105 El, varmi og vask*

| | |
|---|---|
| Streymnýtsla uml. 70.000 kWt + kW gjald ..... | 71.0 |
| ljósrør v.m..... | 5.0 |
| olja 32.000 l á 3,75 kr..... | 120.0 |
| eftirlit við hitaverkinum og ljósinum ..... | 1.5 |
| vask ..... | 6.5 |
| | 204.0 |

*213503 Umsiting*

| | |
|---|---|
| Eftirlit við lyftu v.m. | 3.0 |
| umsiting og umvæling annars | 15.0 |
| | 18.0 |

Her kann sum frálíður væntast vaksandi umvælingar- og umsitingararbeiði.

*233051 Innbúgv*

| | |
|---|---|
| Skuffuskáp til smáprentsavnið | 12.0 |
| arbeiðsborð til goymsluna | 3.0 |
| stálhillar til goymsluna | 20.0 |
| | 35.0 |

*233409 Leiga av maskinum*
Longu í ár er neyðugt at leiga eina størri Xerox-maskinu, tann núverandi klárar ikki tørvin.
Leiga við teljara uml. 2480 kr. pr. mánað.

Sbrt. skriv dagf. 20. okt. 1982 frá Føroya Landsbókasavni:

Ískoyti til uppskotið til fíggjarætlan fyri 1983/84 viðvíkjandi *rakstrarstaði 15109 konto 253085 Bókakeyp og innbinding*.

Eftir at uppskotið var sent inn, eru vit komin eftir, at bæði bókaprísirnir og innbindingarprísirnir longu nú liggja væl hægri, enn tá varð roknað við, eins og mikrofilmingin av bløðunum fer at kosta munandi meira enn tær ætlaðu 60.000 kr. til ajourføring, heldur 100.000 kr.

Sostatt verður skotið upp at seta inn í uppskotið til nevndu

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| konto fyri fíggjarárið | | | 1983/84 ..... | 360.000 kr. |
| og | — | — | 1984/85 ..... | 380.000 — |
| og | — | — | 1985/86 ..... | 410.000 — |

Tá er roknað við, at meirútreiðslan til mikrofilmingina verður tikin

yvir 3 ár við 20.000 kr. í 1983/84 og 10.000 kr. hvørt árið aftaná. Meirútreiðslan til innbinding og innbindingartilfar er mett til 10.000 kr. hetta fyrsta árið.

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Játtað 1/2 bókbindara/konservator

**Ad § 15-15202: Fólkabókasøvn**

Sbrt. skriv dagf. 4. okt. 1982:

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84 viðv. rakstrarstaði *15202 Fólkabókasøvn*

| | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot lands-stýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 253011 | Umsjón ..... | 2.363 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4,0 | 4,0 |
| 253202 | Rithøvundasamsýning .. | 46.488 | 53.000 | 60.500 | 60.500 | 60,5 | 60,5 |
| 323181 | Bygging og nýstovnan .. | 0 | 350.000 | 850.000 | 850.000 | 850,0 | 850,0 |
| 373106 | Rakstrartilskot ..... | 2.096.546 | 2.120.000 | 2.417.400 | 2.417.500 | 2.417,5 | 2.417,5 |
| | **Tilsamans** | **2.145.397** | **2.527.000** | **3.331.900** | **3.332.000** | **3.332,0** | **3.332,0** |

253011 *Umsjón*
Landsbókasavninum er álagt at hava umsjón við fólkabókasøvnunum. — Óbroytt ætlan fyri komandi 2 fíggjarárini.

253202 *Rithøvundasamsýning*
Upphæddin er við lóg ásett at svara til 2,5% av játtanini til fólkabókasøvnini (konto 373106). Í 1981/82 vóru 60 rithøvundar, sum skriva á føroyskum, umboðaðir í fólkabókasøvnunum við 5.046 bókum. Gjaldið pr. bók var 9,22 kr. Játtanin í 1982/83 verður býtt í mars 1983 ímillum 61 rithøvundar við 5.400 bókum ella uml. 9,80 kr. pr. bók.

323181 *Bygging og nýstovnan*
Fráboðaða byggingin í Klaksvík er ikki byrjað, og óvist er nú, um og nær hon verður. — Fuglafjarðar bókasavn hevur projekterað bygging av fólkabókasavni at byrja í 1983. Kostnaðurin 3 mió. kr. er ætlaður býttur upp í 300.000 kr. hetta fíggjarárið, 1,7 mió. næsta og 1 mió. kr. í 1984/85. Lógásetti studningurin er 50% av kostnaðinum, um byggiætlanin verður góðkend av landsstýrinum. -- Lorvíkar kommuna hevur boðað frá, at hon í ár fer undir stovnsetan av fólkabókasavni við skúlabókasavni. Høli er tøkt. Stovnsstudningurin verður neyvan oman fyri 20.000 kr. í hesum ári. — Ætlað upphædd í 1984/85 500.000 kr.

373106 *Rakstrarstudningur*
Landskassastudningurin er 60% av rakstrarútreiðslunum árið fyri. Yvirlitið niðanfyri er sett upp eftir fíggjarætlanini hjá hvørjum savninum sær, har hon hevur fingist. Søvnini a, c, d, i og j hava ikki søkt um studning í 1982/83. — Skúlabókasøvn fáa ikki studning eftir lógini um fólkabókasøvn, uttan at tey eisini røkja fólkabókasavnsuppgávur.

| | | Ætlaður rakstur 1982/83 | Studningur 1983/84 |
|---|---|---|---|
| a. | Bókasavnið í Nes kommunu ..... | 26.000[x] | 15.600 |
| b. | Býarbókasavnið, Tórshavn ..... | 2.930.000 | 1.758.000 |
| c. | Eiðis bókasavn ..... | 10.000[x] | 6.000 |
| d. | Fuglafjarðar bókasavn ..... | 83.000[x] | 49.800 |
| e. | Glyvra bókasavn ..... | 52.000 | 31.200 |
| f. | Klaksvíkar bókasavn ..... | 564.000 | 338.400 |
| g. | Kollafjarðar bókasavn ..... | 61.000 | 36.600 |
| h. | Lorvíkar bókasavn ..... | 40.000[xx] | 24.000 |
| i. | Sandavágs-Miðvágs bókasavn, Giljanes | 23.000[x] | 13.800 |
| j. | Sandoyar bókasavn, Sandi ..... | 24.000[x] | 14.400 |
| k. | Sunda bókasavn, Oyri ..... | 9.000 | 5.400 |
| l. | Sørvágs bókasavn ..... | 41.000 | 24.600 |
| m. | Tvøroyrar bókasavn ..... | 49.000 | 29.400 |
| n. | Vágs bókasavn ..... | 60.000 | 36.000 |
| o. | Vestmanna bókasavn ..... | 57.000 | 34.200 |
| | **Tilsamans** | **4.029.000** | **2.417.400** |

[x] eingin fíggjarætlan komin 1. okt. 1982
[xx] savnið ikki byrjað og eingin fíggjarætlan fingin

---

Bókasavnsmálið alt er so ógreitt í løtuni, at ógjørligt er at gera nakra haldgóða meting av studningstørvinum komandi árini. M.a. veldst nógv um, *hvussu* skúlabókasavnsskipanin verður, *um* bókasavnsskipanin yvirhøvur verður gjørd meira tíðarhóskandi, eitt nú við bókabilstænastu, *um* studningsskipanin verður endurskoðað til fyrimunar fyri tey smærru bókasøvnini o.s.fr.

**Ad § 15-15304: Føroya Landsskjalasavn**

Sbrt. skriv dagf. 15. oktober 1982:

Hervið senda vit fíggjarætlan fyri 1983/84 og metta fíggjartørv fyri 1984/85 og fyri 1985/86.

Fyrivarni verður tikið viðvíkjandi metingunum fyri 84/85 og fyri 85/86.

Biðið verður um, at skjal IV (Bræv til landsstýrið d. 15. okt. 81) verður sett við í fylgiskjølini.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot Lands-stýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 1000 kr. | Ætlan 1985/86 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk | 373.076,- | 366,0 | 500.070 | 500,0 | 500,0 | 500,0 |
| 103168 | Løn - sáttmálalønt | 236.075,- | 204.0 | 344.243 | 210,9 | 210,9 | 210,9 |
| 113202 | Ferða- og dagpening, innanlands | 2.120,- | 25.0 | 25.000 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| 113243 | Ferða- og dagpening, uttanlands | 0,- | 0.0 | 0.000 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 0,- | 0.0 | 0.000 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 878,- | 0.5 | 10.000 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 0.000,- | 50.0 | 50.000 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| 233051 | Innbúgv | 112.084,- | 45.0 | 90.000 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| 233155 | Prentlutir | 10.821,- | 18.0 | 18.000 | 18,0 | 18,0 | 18,0 |
| 233259 | Postgjald | 915,- | 1.0 | 2.000 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 7.563,- | 8.0 | 14.000 | 14,0 | 14,0 | 14,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 25.171,- | 18.0 | 20.000 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 34.647,- | 3.0 | 3.000 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| 253505 | Konservering | 5.430,- | 50.0 | 50.000 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| 000000 | Flyting — skjalasøvn v.m. | 0.000,- | 0.0 | 15.000 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| 000000 | Pakkitilfar, arkiveskjur v.m. | 0.000,- | 0.0 | 15.000 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| 000000 | Vísindaligar kanningar | 0.000,- | 0.0 | 21.650 | 21,7 | 21,7 | 21,7 |
| 000000 | Útgáva av søguligum keldum | 0.000,- | 0.0 | 10.000 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 000000 | Skráseting | 0.000,- | 0.0 | 28.125 | 28,4 | 28,4 | 28,4 |
| **Tilsamans** | | **808.762,62** | **789.0** | **1.216.088** | **1.083,0** | **1.083,0** | **1.083,0** |
| Byggigrunnur | | 1.5 mill. | 2.0 mill. | | | | |

**Viðmerkingar til 84/85 og 85/86**

1 landsskjalavørður
1 skjalavørður x)

*Starvsfólk:*
3 savnshjálparar
1/2 konservator x)

*Tímalønt:*
Avloysari 1/4 tíð

*Onnur:*
Leys hjálp 1/2 tíð x)

x) eru nýnormeringar

**Viðmerkingar til 84/85 og 85/86**

*Ad. 103143, Løn - Starvsfólk:*
Roknað verður við einum skrivstovufólki afturat í 84/85 og einum savnsmedhjálpara í 85/86 av tí støðugt vaksandi virkseminum á savninum. Hetta virksemi stendst av teim mongu embætis- og stovnsskjalasøvnum, sum eru avhandað landsskjalasavninum tey seinastu árini.

*ad. 103168, Løn - Sáttmálalønt:*
Roknað er við einum vísindaligum útbúnum skjalavørði í 85/86: E.A.C. ella verkfrøðingasáttmála.

*ad. 213105, El, hiti og vask:*
Tað verða í teimum komandi árunum so nógvar goymslur í leigaðum hølum, at hendan kann ikki verða goldin av felagsrakstrinum á Debesartrøð.

*213408, Umvælingar v.m.:*
Tær rullandi automatisku compactusreolirnar eru í so ringum standi, at tær støðugt mugu umvælast.

*213806, Leiguútreiðslur:*
Við tí vaksandi skjalatilfari, sum verður latið savninum, mugu einir 3-400 $m^2$ leigast úti í býnum, til nýtt landsskjalasavn er bygt.

*233051, Innbúgv:*
Av 213806 fylgir, at nógvar hillar o.a. mugu keypast.

*253505, Konservering:*
Antin savnið fær egnan konservator, ella handritini verða send niður at konserverast, so er tørvurin vaksandi, tí skjøl í túsundatali eru um at gerast til dust.

*000000, Útgáva:*
Ætlanin er at royna at publicera tey granskingarúrslit viðv. Føroya søgu, sum starvsfólkið kemur fram til í sínum arbeiði, soleiðis at savnið fær sent út keldur við fakligum viðmerkingum.

*000000, Stuðul til bygdasøgu:*
Sum kunnugt er stórur áhugi í Føroyum fyri bygdasøgu.

Nógv verður granskað og skrivað av bygdasøgu av søgufróðum fólkum úti um landið.

Landsskjalasavnið roynir at stuðla hesum fólkum, men stuðulin er avmarkaður orsakað av peninga- og manningartroti.

Hesin stuðul kann bert veitast av landsskjalasavninum, av tí at tað mesta tilfarið til bygda- og ættarsøguna eins og vinnulívssøguna liggur her.

Við eini serstakari játtan til bygdasøgu kundi landsskjalasavnið stuðlað bygdasøgugransking við ókeypis kopium, skeiðum og við at hjálpt til at skipa skjalatilfarið hjá bygdasøvnum.

**Skjal III**

**Viðmerkingar:**

*ad. 103143: Løn - starvsfólk:*
Um konservator, sí umsókn frá 1981/82.

Neyðugt er við leysari hjálp, tá t.d. nógv er at gera um summarið — til vaktarhald, um savnið skal hava opið um kvøldið, og tá skjøl skulu yvirtakast frá stovnum.

Roknað er við, at savnshjálparin, sum nú er í lønarflokki 9.5 verður fluttur upp í 12.1 sambært grein 21 stk. í sáttmálanum og grein 2 í lønarsáttmálanum.

Hesin savnshjálparin hevur fingið sína upplæring og røkir nú sjálvstøðugt arbeiðsøki við ábyrgd fyri einum parti av Landsskjalasavninum.

Meirútreiðsla árliga kr. 3.600,-.

*ad. 103168: Løn - sáttmálaløn:*
Um grundgeving fyri, at søkt verður um nýnormering, sí hjálagt bræv til landsstýrið dagfest 15. oktober 1981. (Skjal IV)

*ad. 213408: Umvælingar v.m.:*
Tær sjálvkoyrandi »compactus-hillarnar« eru fleiri í so ringum standi, at tær ikki kunnu flytast — mugu tí univælast skjótast gjørligt.

*ad. 233051: Innbúgv:*
Landsskjalasavnið eigur ein hóp av skjølum, ið eru avmyndað á mikrofilmum. Somuleiðis eru nógvar av teim elstu handritaðu bókunum so illa farnar, at tær ikki eiga at verða læntar út á lesistovuna.

Tað er tí altumráðandi at fáa hesar bøkur mikrofilmaðar.

Av somu orsøk hevur savnið brúk fyri einum lesitóli til mikrofilmar.

Játtaðar eru í verandi fíggjarári kr. 25.000,-, men tær sláa als ikki til, tí tað lesitól, tørvur er á, kostar kr. 70.000,-.

Restin av umsóknini, kr. 20.000,-, er til endurnýggjan av innbúgvi, fyrst og fremst hillum.

*ad. 233554: Telefon og telex:*
Hækkingin stavar frá, at savnið varð noytt at skifta vekslara út. Verandi vekslari kostar kr. 6.000,- at »leasa« um árið.

*ad. 000000: Flyting - skjalasøvn v.m.:*
Ofta boða stovnar frá, at teir skulu lata Landsskjalasavninum bøkur og skjøl.

Higartil hevur savnið fíggjað útreiðslur, ið standast av hesum flytingum, yvir konti, sum eru ætlað øðrum uppgávum. Hetta er óheppið, og má tað tí haldast at vera beinast at hava eina serstaka konto til hesar útreiðslur.

*ad. 000000: Pakkitilfar, arkiveskjur v.m.:*
Innkomin skjøl og bøkur mugu oftast pakkast av nýggjum.

Verandi skjøl verða støðugt umpakkað í arkiveskjur, ið eru framleiddar til endamálið.

*ad. 000000: Vísindaligar kanningar:*
Á Landsskjalasavninum er nógv søguligt tilfar, sum tørvur er at fáa kannað, men sum starvsfólkini ikki hava tíð og høvi at taka sær av í løtuni.

Sum dømi kann nevnast at skráseta innihaldið í teim elstu bókunum hjá fútavaldinum og stiftamtinum.

Vit hugsa okkum, at ein søgulesandi kundi arbeitt við hesum 3 mánaðir árliga, løntur eftir lønarflokki 9.1 SMF.

*ad. 000000: Útgáva av søguligum keldum:*
Sum kunnugt er alt tað elsta søguliga tilfarið á savninum nærum ólesiligt hjá teim, sum ikki dagliga virka her, við tað at hetta tilfar er skrivað við gamlari gotiskari handskrift.

Fyri at gera hetta tilfar atkomiligt fyri granskarar, skúlaungdómin og almenningin, er ætlanin at skriva av og geva út árliga eini 100 síður margfaldaðar í umleið 100 eintøkum.

Hetta er mett til umleið 10.000 kr., heft.

Tað er ein royndur lutur, at føroyski skúlin fullkomiliga manglar tilfar til keldulesnað í Føroya Søgu.

Hesar keldur finnast fyri ein stóran part á Landsskjalasavninum og kunnu bert skrivast av her.

Ætlanin er at selja kelduheftini til skúlar, so ein partur av hesi útreiðslu kemur aftur.

*ad. 000000: Skráseting:*
Landsskjalasavnið fær nógvar fráboðanir um gomul privat, kommunal ella almenn skjalasøvn, sum liggja úti um landið og eru í vanda fyri at fara fyri skeyti.

Ætlanin við hesi játtan er at fáa skrásett og varðveitt hesi skjøl — helst á staðnum, har tey finnast.

*Byggigrunnur:*
Sum ofta ávíst, eru plássviðurskiftini út av lagi á Landsskjalasavninum.

Mælt verður til at seta 1 millión í byggigrunn, og verður vist til grundgevingar í brævi til Føroya landsstýri, dagfest 15. oktober 1981, ið er hjálagt sum **skjal IV**.

Sbrt. skriv dagf. 15. okt. 1981 frá Landsskjalasavninum:

**Skjal IV**

Føroya landsskjalasavn hevur fleiri ferðir gjørt landsstýrið vart við, at plásstrotið og manningartrotið á savninum ger tað ómøguligt at loysa bert ein part av teimum uppgávum, sum liggja á Landsskjalasavninum.

Í hesum sambandi kann verða víst til brævaskiftið millum fyrrverandi landsskjalavørðin og landsstýrið og til skriv frá savninum 3. juni 1981, 16. juli og 23. juli 1981. Somuleiðis kann verða mint á vitjan hjá landsstýrismanninum Tórbjørn Poulsen í heyst á Landsskjalasavninum.

Sum landsstýrinum kunnugt hevur Landsskjalasavnið á komandi fíggjarætlan søkt um nýnormering av einum starvi til eitt fólk við akademiskari útbúgving, og hugsað verður her um lærugreinina søgu, ið er tann grein, sum krevst fyri at kunna virka á skjalasavni í Danmark og øðrum londum. Somuleiðis er eisini søkt um betri pláss, og skal hetta skriv metast sum ein viðmerking til hesar umsóknir.

Í hesum sambandi skal eg loyva mær at greiða eitt sindur frá savninum og tess uppgávum við teirri vón, at tað gerst møguligt at fáa teir játtandi myndugleikarnar at skilja, hvussu týðandi tað er, at savnið nú fær tolulig arbeiðskor.

Tá tað almenna hevur sett eitt alment skjalasavn á stovn, so hevur hetta savn tvey høvuðsendamál, soleiðis sum danski landsskjalavørðurin Harald Jørgensen dr.phil. hevur víst á í skrivi til landsstýrið í 1973. Fyrsta høvuðsendamálið er at varðveita tey almennu skjøl, sum umsiting, lóggávuvald og dómsvald ikki hava brúk fyri til dagligt, men sum til eina og hvørja tíð skulu kunna finnast fram. Teir almennu stovnar, sum nú brúka Landsskjalasavnið til hetta endamál, eru løgtingið, landsstýrið, ríkisumboðið, landfútin, sorinskrivarin og so nakrir almennir stovnar undir hesum høvuðsstovnum t.d. Almannastovan, Lønjavningargrunnurin o.s.fr.

Hitt høvuðsendamálið er at virka sum tjóðskjalasavn og hervið vera tí søguligu granskingini til hjálpar. Tað er jú soleiðis, at tað skjalatilfar, sum liggur til dømis á Føroya Landsskjalasavni, er høvuðskeldan til Føroya søgu. Her finnast tinghøkdurnar frá 1615 til 1945. Alt tað skrivliga, sum liggur eftir sýslumenninar, fútaarkivið frá 1701 o.s.fr. Umframt alt hetta sera rúgvusmikla og framúr týðandi søguliga tilfar liggur ein hópur av skjølum í Danmark. Ein partur er ogn Landsskjalasavnsins, t.d. arkivið hjá Kongaliga danska Einahandlinum, men ikki er hugsingur um at biðja um at fáa hetta savn heim soleiðis, sum umstøðurnar eru á savninum í dag.

Her kann verða lagt afturat, at uttan at tað slepst lættliga til hetta søguliga tilfar eru søgugransking og søguskriving illa fyri. Um søgugranskarar skulu kunna brúka tað veldiga tilfar, sum finst á landsskjalasavninum, er neyðugt, at gjørd verða yvirlit og registraturar, soleiðis at granskarar síggja, hvat her er, og hvussu teir kunnu finna fram til tað, sum her er. Her er ikki bert talan um Føroya søgu sum

heild, men eisini um bygdasøgu og ættarsøgu.

Um eitt nationalt skjalasavn skal kunna veita granskarum tað neyðturviliga tænastuna, so má tað hava starvsfólk og pláss — so mikið, at savnið fær veitt eitt minimum av tænastum. Øllum er kunnugt, at hetta loyvir starvsfólka- og plásstrotið okkum ikki í dag. Tað starvast í løtuni 4 fólk á Landsskjalasavninum. Hetta er alt ov lítið, og ger hetta, at bert verður tíð til tær dagligu avgreiðslurnar til stovnar og vitjandi.

Viðvíkjandi plássinum, so eru viðurskiftini bart út sagt ótolandi, bæði fyri starvsfólk og vitjandi. Ein stórur partur av arbeiðinum fer fram í kjallara undir jørð, og sum heild má sigast, at savnið er í stríð við lóg nr. 58 av 24 mai 1973 um arbeiðaravernd, serliga reglugerð A001, pkt. 6 og 23 um útgangsviðurskifti og dagsljós undir arbeiði. Samstundis kann verða mint á, at vit als ikki fáa herbergað teimum mongu skjølum, sum í næstum verða avhent, eins og vit longu nú aftur búleikast í trimum ymiskum kjallarum.

Út frá hesum fáu viðmerkingum um støðu og uppgávur savnsins loyvi eg mær at mæla til, at nýnormeringin verður játtað. Tað snýr seg um eitt vísindaligt starv til skipan og skráseting og til at verða teimum mongu útlendsku og føroysku granskarum til hjálpar, sum vitja savnið. Viðvíkjandi plássinum, so skal verða víst á, at Landsskjalasavnið upprunaliga átti í grunni til bygging av nýggjum landsbókasavnið og landsskjalasavni. Tíverri var allur peningurin í grunninum, ca. 4,5 mill. kr. brúktur til nýtt landsbókasavn eina, og varð Landsskjalasavnið sostatt við sviðið soð. Tað var koyrt niður í kjallaran á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum í allar mátar er fullkomiliga óhóskandi til landsskjalasavn. Frá Landsskjalasavninum verður tí mælt til, at peningurin av nýggjum verður settur av í grunn til nýtt landsskjalasavn, eins og tað átti at verið kannað, um ikki peningur kann verða førdur aftur til grunnin frá Landsbókasavnsbyggingini. Henda bygging er helst ikki endaliga liggjað enn, so tað ber tí til at flyta aftur tann pening, ið í roynd og veru er ogn Landsskjalasavnsins og tiskil ikki brúktur til tað, sum hann upprunaliga varð játtaður til.

Síðan skulu vit mæla til, at farið verður undir at projektera nýtt landsskjalasavn møguliga í sambandi við nýggja landsbókasavnið, so hesir báðir stovnar, ið áður vóru undir sama taki, í framtíðini kunnu nýta somu facilitetir t.d. bókasavn, lesisal, kopieringstól, fotoverkstað, konserveringsverkstað, W.C., garderobu, vekslara og hitaverk, sum er dimensionerað til ein bygning afturat.

Við hesum fáu reglum havi eg enn eina ferð roynt at fáa politikkararnar at skilja, hvussu átroðkandi neyðugt tað er bæði við meiri

fólki og plássi á landsins skjalasavni. Eg vóni, at nakað gott kemur burturúr, tí her er hóast alt talan um okkara tjóðskjalasavn — um løgtingsins egna arkiv og um eitt savn, hvørs innihald er víðagitið, ikki bert um norðanlond, men so víða sum til Bretland og USA, haðani vísindamenn í hópatali koma at granska í okkara fornu skjølum og handritum. Hetta savn mátti havt eina betri lagnu uppiborna enn at verða slongt úr einum kjallara í annan hesi tríati árini, tað hevur verið umsitið av heimastýrinum.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Ikki játtað 1 skjalavørð aftrat.
Játtað 1/2 konservator.
Játtað 1/2 tíð kr. 8.875,- til leysa hjálp um summarið.

**Ad §15-15406: Føroya Fornminnissavn:**

Sbrt. skriv dagf. 6. okt. 1982:

Hjálagt verður sent Landsstýrinum uppskot savnsins til fíggjarlóg fyri fíggjarárið 1983/84 og ætlan fyri fíggjarárini 1984/85 og 1985/86.

| | | | | í 1.000 kr. | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Rokuskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
| 103048 | løn tænastumenn | 82.428,75 | 91,0 | 90,5 | 90,5 | 90,5 | 90,5 |
| 103143 | løn starvsfólk | 706.762,09 | 744,4 | 780,2 | 780,2 | 780,2 | 780,2 |
| 103168 | løn, sáttmálalønt | 483.567,74 | 622,4 | 852,9 | 852,9 | 852,9 | 852,9 |
| 103222 | løn, reingerð | 47.007,50 | 55,2 | 58,9 | 58,9 | 58,9 | 58,9 |
| 103288 | løn onnur | 581.400,58 | 642,0 | 671,5 | 491,5 | 491,5 | 491,5 |
| 113202 | ferða- og dagpeningur | 59.773,40 | 95,7 | 107,7 | 107,7 | 107,7 | 107,7 |
| 203905 | upplýsingarvirksemi | 11.024,33 | 16,9 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 |
| 213408 | el, hiti og vask | 32.934,89 | 31,7 | 35,7 | 35,7 | 35,7 | 35,7 |
| 213408 | umvælingar v.m. | 30.231,00 | 33,7 | 137,9 | 137,9 | 137,9 | 137,9 |
| 213702 | tryggingar | 6.464,00 | 19,1 | 21,5 | 21,5 | 21,5 | 21,5 |
| 213806 | leiguútreiðslur | 52.500,00 | 60,8 | 68,4 | 68,4 | 68,4 | 68,4 |
| 233051 | innbúgv | 35.913,27 | 47,4 | 64,4 | 64,3 | 64,3 | 64,3 |
| 233259 | postgjald | 3.766,50 | 5,6 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| 233354 | telefon | 20.204,50 | 21,7 | 24,5 | 24,5 | 24,5 | 24,5 |
| 233561 | aðrar skrivstovuútreiðslur | 8.963,55 | 11,7 | 27,7 | 27,7 | 27,7 | 27,7 |
| 253085 | bókakeyp | 14.819,60 | 14,8 | 17,1 | 17,1 | 17,1 | 17,1 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 253115 | útgrevstur ..... | 19.731,52 | 22,5 | 45,3 | 45,3 | 45,3 | 45,3 |
| 253268 | ums. av fornminnum ..... | 22.364,06 | 79,4 | 152,3 | 152,3 | 152,3 | 152,3 |
| 253306 | amboð ..... | 13.133,00 | 16,9 | 19,0 | 19,0 | 19,0 | 19,0 |
| 253314 | aðrar umsitingarútreiðslur . | 7.856,30 | 85,0 | 95,6 | 95,6 | 95,6 | 95,6 |
| 253322 | fólkalívsrannsókn ..... | 14.832,01 | 16,9 | 19,0 | 19,0 | 19,0 | 19,0 |
| 253903 | aðrar útreiðslur ..... | 3.871,75 | 5,6 | 57,0 | 57,0 | 57,0 | 57,0 |
| | | **2.259.550,34** | **2.739,7** | **3.384,7** | **3.185,0** | **3.185,0** | **3.185,0** |

**Føroya Fornminnissavn** — **Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84,** — **skjal 1**
*Rakstrarstað nr. 15406* — **útgreinað á deildir/arbeiðsøki.**

| kt.nr. | | deild 1 | 2.1 | 2.2 | 3.1 | 3.2 | 3.3 | 4 | 5 | 6.1 | 6.2 | 6.3 | 7.1 | 7.2 | 8.1 | 8.2 | tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn . | | | | | | | | | | | | | | 90.5 | | 90.5 |
| 103143 | Løn/starvsfólk .... | 302.9 | 54.3 | | | | | 142.6 | | 143.5 | | | 136.9 | | | | 780.2 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt .. | 278.6 | 180.1 | | | | | | | 160.0 | | | 234.2 | | | | 852.9 |
| 103222 | Løn/reingerð ... | 55.3 | | | | 3.6 | | | | | | | | | | | 58.9 |
| 103288 | Løn/onnur ..... | 91.9 | 87.4 | 8.6 | 25.9 | 10.5 | 25.7 | 16.1 | 29.4 | 18.8 | 84.5 | 129.8 | 18.3 | 47.0 | 57.0 | 20.6 | 671.5 |
| 113202 | Ferða- og dagpen... | | 14.0 | | 12.7 | | | | | 23.7 | 16.0 | 16.0 | 19.0 | | 6.3 | | 107.7 |
| 203905 | Upplýsingarvirks[illegible] | | | | | | | | | | | | | | 10.0 | 20.0 | 30.0 |
| 213105 | El, hiti og vask .... | 35.7 | | | | | | | | | | | | | | | 35.7 |
| 213408 | Umvælingar v.m. .. | 137.9 | | | | | | | | | | | | | | | 137.9 |
| 213702 | Ognartrygging .... | 21.5 | | | | | | | | | | | | | | | 21.5 |
| 213806 | Leiguútreiðslur .... | | | | | | | 68.4 | | | | | | | | | 68.4 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 6.3 | | | | | | 58.0 | | | | | | | | | 64.3 |
| 233259 | Postgjald ..... | 8.0 | | | | | | | | | | | | | | | 8.0 |
| 233354 | Telefon ..... | 24.5 | | | | | | | | | | | | | | | 24.5 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 27.7 | | | | | | | | | | | | | | | 27.7 |
| 253085 | Bókakeyp ..... | 1.4 | 2.6 | | 2.6 | | | 1.4 | | 2.6 | | | 5.1 | | 1.4 | | 17.1 |
| 253115 | Útrevstur ..... | | | | | | | | | 35.3 | 5.0 | 5.0 | | | | | 45.3 |
| 253268 | Umsiting av fornminnum ..... | | | | 44.3 | 108.0 | | | | | | | | | | | 152.3 |
| 253306 | Amboð ..... | | 19.0 | | | | | | | | | | | | | | 19.0 |

| | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 253314 | Aðrar umsitingarútr. | | | | | 69.9 | 12.7 | 12.7 | | | | | | | | 95.3 |
| 253322 | Fólkalívsrannsókn . | | | | | | | | | | | 19.0 | | | | 19.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ... | 7.0 | 10.0 | | | | | | | | | 40.0 | | | | 57.0 |
| | | **998.7** | **367.4** | **8.6** | **85.5** | **122.1** | **95.6** | **299.2** | **42.1** | **383.9** | **105.5** | **150.8** | **472.5** | **47.0** | **165.2** | **40.6** | **3.384.7** |

1. Fyrisiting
2.1. Fornminnaumsjón
2. — , føst røkt
3.1. Bygningaumsjón
2. — , Dúvugarðar
3. — , Skansin
4. Gripasavn
5. Myndasavn
6.1. Fornfrøðilig deild
2. — — , rannsókn
3. — — , rannsókn
7.1. Fólkalívsdeild
2. — , rannsókn
8.1. Upplýsingardeild
2. — , serframsýning

**Útgreining av lønarkonti** **skjal 2**

| Heiti | Lønartl. stig | Tal av størvum játtað 1982/83 | søkt nýjáttan 1983/84 | Tilsamans 1983/84 | Løn |
|---|---|---|---|---|---|
| *kt.nr. 103048* | | | | | |
| *tænastumenn:* | | | | | |
| savnslærari ..... | 27.4 | 1/2 | | 1/2 | 90.450 |
| *kt.nr. 103143* | | | | | |
| *starvsfólk:* | | | | | |
| savnsskrivari ..... | 12.3-4 | 2/3 | 1/3 | 1 | 130.996 |
| assistentur ..... | 9.6-7 | 1 | | 1 | 125.363 |
| assistentur ..... | 9.14 | 1/3 | | 1/3 | 46.507 |
| konservator ..... | 15.3-4 | 1 | | 1 | 142.567 |
| savnshjálpari ..... | TF. 3.8-9 | 1 | | 1 | 136.897 |
| savnshjálpari ..... | TF. 3.11.12 | 1 | | 1 | 143.532 |
| savnshjálparanæm. | TF. 40% | | 1 | 1 | 54.287 |
| *kt.nr. 103168* | | | | | |
| *sáttmálalønt:* | | | | | |
| landsantikvarur ... | 15. ár | 1 | | 1 | 278.567 |
| savnsvørður ..... | 1. ár | 1 | | 1 | 160.046 |
| savnvørður ..... | 11. ár | 1 | | 1 | 243.190 |
| savnshjálpari ..... | 5.-6. ár | 1 | | 1 | 180.105 |

**Viðmerkingar:** Í upphæddirnar eru innroknaðar kendar aldursviðbøtur og 5 dýrtíðarviðbøtur í mun til upphæddirnar pr. 1. juli 1982.

*ad. kt.nr. 103048.* Upphæddin er minni enn játtanin 1982/83 helst tí hon tá hevur verið skeivt útroknað.

*ad kt. nr. 103143. og kt. nr. 103168.* Løn til 1 savnshjálpara er ikki sum tilmanundan tikin við á kt.nr. 103143, men á kt. nr. 103168, vísandi til umsókn savnsins um umnormering, dagf. 29.9.1982.

*ad kt.nr. 103143.* Savnið søkir um fulla arbeiðstíð til savnsskrivaran. Søkt verður um játtan til setan av savnshjálparanæmingi til forminnaumsjónina.

*ad kt.nr. 103168.* Eftirlønargjøld eru íroknað.

**Viðmerkingar:**
Sum heild byggir fíggjarlógaruppskotið á játtanina í verandi fíggjarári við reguleringum sambært vøksturin í prís- og lønargrundarlagnum. Savnið setir tó eisini í sambandi við arbeiðsætlan sína fram nøkur nýggj ynski, sum greitt verður frá í viðmerkingunum til einstøku greinirnar.

Uppskotið er sundurgreinað á deildir/arbeiðsøki í skjali 1.

Ætlan fyri fíggjarárini 1984/85 og 1985/86 er tað nærum ógjørligt at gera, partvíst tí at savnið viðvíkjandi hølisviðurskiftum og arbeiðsumstøðum sum heild enn ikki veit, hvat tey komandi árini bera í sær, og partvíst tí ov stutt tíð hevur verið at umhugsa hesar ætlanir. Tey flestu tølini í ætlanunum fyri 1984/85 og 1985/86 eru tí bert framflutt, einans við aldursviðbótum roknaðum í føstu lønirnar. Í teimum førum, bar langtíðarætlanir ella serlig ynski longu fyriliggja, eru hesar upphæddir tó tiknar við.

*ad kt.nr. 103048, 103143, 103168* verður víst til skjal 2.

*ad kt.nr. 103143.* Til ætlanina 1984/85 er at viðmerkja, at savnið tá fer at søkja játtan til fotograf, sum av prioriteringsorsøkum ikki verður tikin við í fyriliggjandi uppskoti.

*ad kt.nr. 103288.* Upphæddin er regulerað eftir galdandi reglum. Býtið millum arbeiðsøkini sæst á skjali 1, men kann seinri verða ávirkað av broytingum í arbeiðsætlanini.

*ad kt.nr. 113202.* Óbroytt. Upphæddin er regulerað eftir galdandi reglum.

*ad kt.nr. 203905.* Savnið hevur nú í mong ár árliga framleitt eina serframsýning, sum hevur verið nógv nýtt bæði innan- og uttanlands, serstakliga av skúlunum. Upphæddin er tó í so tepur, og søkir savnið tí um kr. 11.000 aftur at vanligu játtanini, sum er reguleraða eftir galdandi reglum.

*ad kt.nr. 213408.* Framsýningarhølini á loftinum í gamla bókasavninum eru í vánaligum standi, mest vegna lekar. Tá takið er umvælt, er ætlanin at fara undir umvælingararbeiði innan. Somuleiðis er ætlanin at umvæla og innrætta sunnara partin av loftinum til fram-

sýningar — og serhøli í sambandi við framsýningarnar. Til hesi endamál verður søkt um kr. 100.000.

*ad kt.nr. 232051.* Hækkingin, sum skotin er upp, er ætlað til eitt mikroskop til gripaviðgerðar.

*ad kt.nr. 233259.* Uppskotið er uakað hækkað vegna vøksturin í postgjøldum.

*ad kt.nr. 233561.* Hækkingin, sum skotin er upp, er ætlað til leigu av fotokopieringstóli, íroknað service og pappírsnýtsla. Sum er, hevur savnið atgongd til fotokopieringstól í øðrum bygningum á Debesartrøð, men virkar henda skipan sera óhøglig og arbeiðstarnandi. Fotokopieringstól má í dag metast at vera líka vanlig og neyðug skrivstovuútgerð sum skrivimaskina. Umframt vanliga skrivstovukopiering nýtir savnið eisini fotokopieringstól til tekningar v.m.

*ad kt.nr. 253115.* Í sambandi við fornfrøðiligar rannsóknir er umráðandi at kunna sleppa uppfrá at avmynda rannsóknarøkið úr erva. Til hetta endamál eru serlig foto»torn« vorðin vanlig. Fornminnissavnið hevur roynt at hjálpt sær við leigu av krana ella brandbili, men er henda loysnin bæði ov dýr (einar 6-7000 kr. árliga) og trupul — í nógvum førum ógjørlig. Savnið metir, at foto»torn« man kosta einar 20.000 kr., og søkir hesa upphædd.

*ad kt.nr. 253314.* Dúvugarðar í Saksun munnu, næst Kirkjubø, vera mest vitjaða fornminni í landinum, og umsitingin av hesum fornminni liggur undir Fornminnissavninum. Bygningarnir har mugu láa støðuga røkt og ábøtur, men av og á mugu størri umvælingararbeiði gerast á sethús og úthús. Harumframt eru fleiri úthús, sum eru avtoftað so seint, at menn vita, hvussu tey vóru bygd og sóu út. Tað snýr seg um fiskahjall, nátthús við 2 sessum og myllu. Eisini eigur alt økið at verða hampað, gamlar gøtur og tún umvæld, gásarhús, hvanngarður v.m. ábøtt o.s.fr., so umhvørvið á hesum gamla bóndagarði kann gerast so áhugavert og hugvekjandi sum gjørligt.

Fornminnissavnið hevur sett upp eina 3 ára ætlan fyri nevndu arbeiði:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. árið | Umvæling av roykstovutekju ..... | kr. 40.000 | |
| | Ventilatión og hiti ..... | — 60.000 | |
| | Gólv í prestakamari ..... | — 8.000 | 108.0 |
| 2. árið | Skjøldur og vindeygu ..... | — 20.000 | |
| | Smiðjan, tekja v.m..... | — 10.000 | |
| | Kjøthjallur, umvæling ..... | — 6.000 | |
| | Fiskahjallur, endurreistur ..... | — 37.000 | |
| | Nátthús, endurreist ..... | — 8.000 | 81.0 |
| 3. árið | Mylla, endurreist ..... | — 38.000 | |
| | Ábøtur í lendinum ..... | — 25.000 | |
| | Beinkir, borð, ruskíløt ..... | — 10.000 | |
| | Skelti ..... | — 3.000 | 76.0 |

Í fíggjarlógaruppskotið er 1. árið í arbeiðsætlanini tikið við og hini bæði árini sett á langtíðarætlanina.

*ad kt.nr. 253306.* Serstakliga til umsjón við fornminnum, men eisini í sambandi við fornfrøðiligar og fólkalívsrannsóknir og dagligan flutning millum starvshús og gripagoymslu v.m. tørvar savninum harðliga ein hóskandi bil. Av prioriteringsorsøkum er ikki søkt um játtan í hesum uppskoti, men upphæddin er tikin við í ætlanini fyri tey komandi fíggjarárini.

*ad kt.nr. 253314.* Í upphæddina er roknað kr. 42.800 til framhaldandi umvælingararbeiði á Skansanum.

*ad kt.nr. 253903.* Í sambandi við innsavningar- og skrásetingararbeiði savnsins kemur mangan fyri, at fólk gera ólønt stórarbeiði fyri savnið, sum ynskiligt hevði verið at kunnað veitt eina symbolska samsýning fyri. Í sambandi við ta innsavning, sum tilfarið til bókina hjá Jóan Paula Joensen, Fiskafólk, er grundað á, hava eini 235 fólk skrivað meir enn *10.000* síður av frágreiðingum og frásagnum og latið Fornminnissavninum. Ynskiligt hevði verið í hesum føri at kunnað latið heimildarfólkunum t.d. hvør sítt eintak av bókini. Til slíkar samsýningar er skotið upp at seta kr. 50.000 í komandi fíggjarári og kr. 20.000 í ætlanina fyri tey næstu fíggjarárini.

Í sambandi við umsókn Náttúrugripasavnsins um eldtryggjan av Bátahøll og Gamla Landsbókasavninum, sum Náttúrugripasavnið stendur fyri, skal verða viðmerkt, at Fornminnissavnið eisini nýtir hesar bygningar til framsýningar og har hevur forngripir, sum, skuldu teir forfarist, verður skaðin óbøtandi. Sama er at siga um leigaðu gripagoymsluna, sum tó einki gerst við í hesum sambandi, og um starvshús savnsins, sum Landsstýrið stendur fyri. Starvshúsini eru gomul hús úr viði. Nakað av forngripum er altíð í húsunum, men har eru eisini skjøl savnsins við upplýsingum um gripirnar, har er alt skrivligt tilfar um fornfrøðiligar og aðrar rannsóknir, og har er alt tað innsavnaða fólkalívsfrøðiliga tilfarið. Alt hetta tilfar fæst ikki til vega aftur, skuldi tað forfarist. Fornminnissavnið loyvir sær tí at heita á Landsstýrið um eisini at finna útvegir fyri at fáa hesi hús eldtryggjað.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Keyp av mikroskopi verður útsett til 1984/85.

**Ad § 15-15508: Bygdasøvn v.m.**
Sbrt. skriv dagf. 15. okt. 1982:

**Uppskot til fíggjarlóg 1983/84 og ætlan fyri 1984/85 og 1985/86**
*Rakstrarstað 15508 Bygdasøvn v.m.*

| kt.nr. | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103509 | Samsýningar ..... | — | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 373106 | Rakstrartilskot ..... | 29.831,91 | 32.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 |
| 373504 | Fornminnisnevnd ..... | — | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 373905 | Umvælingarstudningur . | 80.016,50 | 90.0 | 100.3 | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| | | 109.848,41 | 150.0 | 198.3 | 198.0 | 198.0 | 198.0 |
| | Í grunn til gomlu prestahúsini á Nesi ..... | — | — | — | 150.0 | — | — |
| | | 109.848,41 | 150.0 | 198.3 | 348.0 | 198.0 | 198.0 |

*Viðmerkingar:*

| | | |
|---|---|---|
| ad kt.nr. 373106 | Miðvágs Bygdasavn | 6.000 |
| | Norðoya Fornminnissavn | 64.000 |

Vegna vaksandi virksemi a Norðoya Fornminnissavni má roknast við vaksandi studningi smb. 11. nr. 17 frá 9. mai 1972 um Bygdasøvn etc.

---

**Viðmerkingar frá landsstýrinum:**
Játtaðar verða 150.000 kr. *í* grunn til keyp av gomlu presthúsunum á Nesi.

**Ad § 15-15551: Fiskirannsóknarstovan**

Sbrt. skriv dagf. 14. oktober 1982:

| | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot Lands-stýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 73057 | Endurgjald ríkið | ÷ 620 | ÷ 659 | ÷ 770 | ÷ 770 | ÷ 770 | ÷ 700 |
| 103143 | Løn starvsfólk | | 115 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 103168 | Løn sáttmálaløn | 1.471 | 1.730 | 1.830 | 1.830 | 1.830 | 1.830 |
| 103288 | Løn onnur | 1 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 68 | 75 | 75 | 75 | 75 | 75 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 70 | 70 | 82 | 82 | 82 | 82 |
| 233051 | Innbúgv | 5 | 15 | 15 | 15 | 15 | 15 |
| 233155 | Prentlutir | — | 20 | 23 | 23 | 23 | 23 |
| 233259 | Postgjøld | 3 | 5 | 7 | 7 | 7 | 7 |
| 233354 | Telefon | 25 | 30 | 35 | 35 | 35 | 35 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 8 | 5 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 253306 | Amboð | 27 | 120 | 690 | 120 | 120 | 120 |
| 253339 | Leiga av førum o.a. | 57 | 220 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 253363 | m/t Magnus Heinason | 4.170 | 4.965 | 7.020 | 7.020 | 7.020 | 7.020 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 13 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| | | **5.298** | **6.761** | **9.617** | **9.047** | **9.047** | **9.047** |

**Viðmerkingar**

103143-103168. Í fíggjarárinum 1982/83 eru sett 2 fólk afturat. Roknað var við, at bæði var sáttmálalønt, men annað er vorðið starvsfólk. Harav stavar hækkingin á konto 103143 í uppskotinum fyri 1983/84.

213806. Høllisviðurskifti okkara eru ógvuliga trong, og tað fer illa at bera til at halda fram leingi afturat uttan broyting. Fróðskaparsetur Føroya hevur vent sær til okkara við tí uppskoti, at teir fara undir bygging á Debesartrøð, har nýggj fiskirannsóknarstova er fyrsta byggistig. Fróðskaparsetrið hevur skotið upp, at kr. 50.000,- verða játtaðar á fíggjarlógini til ein arkitekt at gera kanningar og fyribils kostnaðarmeting av tílíkari bygging. Fiskirannsóknarstovan tekur undir við hesum, um tað kann føra til eina skjóta loysn, og skal heita á játtandi myndugleikar at viðgera umsóknina hjá Fróðskaparsetrinum við vælvild. Víst verður á hjálagda avrit av skrivi dgf. 23. september 1982 frá Fróðskaparsetri Føroya.

253306. Meginparturin av upphæddini ella kr. 625.000,- er til datatól. Vit hava áður gjørt landsstýrið vart við stóra tørv okkara á datatóli (notat hjálagt). Av teimum kr. 625.000,- eru kr. 500.000,- til sjálvt datatólið, har nakað er lagt upp fyri dollarbroytingar og uppseting. Kr. 125.000,- er innflutningsgjald, sum fer aftur í landskassan. Annars er roknað við kr. 40.000,- til EDV service.

253363. Víst verður til hjáløgdu rakstrarætlan fyri Magnus Heinason 1983/84. Serstakliga oljuprísurin fer væntandi at vaksa munandi komandi ár. Hesa upplýsing hava vit frá oljufeløgunum. Aftrat hesum kemur, at vit settu oljunýtsluna ov lágt seinast — 4.000 l um dagin. Nýtslan er 6.000 l um dagin.

**Rakstrarætlan m/t Magnus Heinason 1983/84**

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | 2.516 | |
| Olja (6.000 l/dg í 280 dg. á 2/85) | 4.790 | |
| Trygging | 565 | |
| Vanlukkutrygging | 47 | |
| Reiðskapur | 1.125 | |
| Útgerð | 450 | |
| Proviantur (kr. 60,- pr. dg. í 330 dg. á 14 m) | 277 | |
| Havnagjøld | 10 | |
| Viðlíkahald | 510 | |
| Ymist | 80 | 10.370 |

*Inntøkur:*

| | | |
|---|---|---|
| Avreiðing av fiski (÷ manningarlønir) | 1.550 | |
| Avreiðing royndarfisking | 1.000 | |
| Avreiðing rannsóknir | 300 | |
| Rakstrar- og oljustudningur | 500 | 3.350 |
| **Munur** | | 7.020 |

**Viðmerkingar frá landsstýrinum:**
Peningur til datatól ikki játtaður.

**Ad § 15-15703: Føroya Náttúrugripasavn:**

Sbrt. skriv dagf. 30. sept. 1982:

Við hesum verður sent uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983-84, 1984-85 og 1985-86. Viðvíkjandi serligum hækkingum verður víst til viðmerkingar. Stórur dentur eigur at verða lagdur á umvæling av Gamla Bókasavninum, sí viðmerkingar.

Sum heild má sigast, at játtanirnar higartil eru alt ov smáar, nú vit hava 3 vísindaligar deildir.

| Kontonummar og navn | | 1000 kr. Rokn-skapnr 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot lands-stýrisins 1983/84 | Ætlan 84/85 í 1000 kr. | Ætlan 85/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk ..... | 195 | 300 | 346 | 346 | 410.01) | 410.0 |
| 103168 | Løn - sáttmálalønt ..... | 237.6 | 254 | 257 | 257 | 257.0 | 257.0 |
| 103222 | Løn - reingerð ..... | 42 | 43 | 50 | 50 | 50.0 | 50.0 |
| 103288 | Løn - onnur 1) ..... | 89 | 100 | 146 | 206 | 206.0 | 206.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanlands | 32 | 40 | 10 | 10 | 10.0 | 10.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. útl. ..... | 0 | 0 | 40 | 30 | 40.0 | 40.0 |
| 203308 | Lýsingar ..... | 1 | 0.8 | 1 | 1 | 1.0 | 1.0 |
| 213105 | Hiti og vask ..... | 93.4 | 60 | 123 | 123 | 123.0 | 123.0 |
| 213505 | Umsiting 2) ..... | 100.3 | 100 | 100 | 235 | 460.0 | 100.0 |
| | | | | 1.285 eyka | 235 | 460.0 | 100.0 |
| 213702 | Tryggingar ..... | 5.1 | 6 | 6 | 6 | 6.0 | 6.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 14.7 | 13 | 15. | 15 | 15.5 | 15.5 |
| 233051 | Innbúgv 3) ..... | 10.1 | 10 | 32 | 15 | 32.0 | 32.0 |
| 233155 | Prentlutir ..... | 3 | 3 | 5 | 5 | 5.0 | 5.0 |
| 233259 | Postgjald ..... | 2 | 2 | 3 | 3 | 3.0 | 3.0 |
| 233354 | Telefon ..... | 12 | 12.1 | 16 | 16 | 16.0 | 16.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur 4) | 6.4 | 8 | 5 | 5 | 5.0 | 5.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233085 | Bókakeyp 5) ..... | 0 | 0 | 5 | 5 | 5.0 | 5.0 |
| 253396 | Kanningar- og savnarb. 6) ... | 75.7 | 40 | 90 | 75 | 90.0 | 90.0 |
| 253306 | Amboð 7) ..... | 0 | 0 | 40 | 20 | 40.0 | 40.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 0.7 | 2 | 2 | 2 | 2.0 | 2.0 |
| | | **920** | **993.90** | **2.577.50** | **1.425** | **1.776,5** | **1.416,5** |

1) Konservatorlærlingur liðugt útbúgving 31. nov. 1984; løn kr. 121.000

*Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1983/84*
*Føroya Náttúrugripasavn. Rakstrarstaður 15703*

103288 Løn onnur. Tímaløn fólk — harímillum náttúrufrøðilesandi — til innsavningararbeiði, plantingararbeiði og hjálpararbeiði av ymsum slag. Týdningarmikið er skrásetingararbeiði. Vit hava rættiliga stór søvn, sum bert fyri ein part eru skrásett. Vit fáa alla tíðina nýtt tilfar, deils tað, vit sjálv savna og deils gávur. Vit hava í ár fingið firvaldasavn Leif Dahls og stórt plantusavn frá Botanisk Museum í Keypmannahavn til gávus. Okkara konservatorlærlingur er frá umleið 15. okt. í ár burturstaddur til víðari útbúgving á svønum uttanlands í tvey ár, og vit hava sostatt mist eina arbeiðskraft fyribils. Orsøkin til, at vit bert nýttu kr. 89.000 av teim kr. 100.000 játtaðu seinasta fíggjarár, var tann, at vit máttu flyta pening av hesi konto yvir á kanningar- og savnarbeiði fyri at kunna gera hvalaframsýningina lidna.

113243 Ferðir uttanlands. Av hesi konto eru 12.000 kr. bundnar smb. skriv landsstýrisins 22/8-1980. J. Jóhansen hevur ætlanir um at gera eina plantuinnsavningarferð til Íslands summarið 1983 í samstarvi við íslendingar.

213503 Umsiting kr. 100.000. Til viðlíkahald av Bátahøllini, Gamla Bókasavninum og Lítla Húsi. Máling, umvælingar, útskiftan av oljufýri o.a.

**Umsókn um cykajáttan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Takið á Gamla Bókasavninum leggjast av nýggjum | kr. 135.000 |
| 2. | Nýggj vindeygu á Gamla Bókasavninum | kr. 360.000 |
| 3. | Eldsløkkingaranlegg (Halon) Bátahøllin | kr. 383.000 |
| 4. | Eldsløkkingaranlegg (Halon) Gamla Bókasavnið | kr. 407.000 |

1. Viðvíkjandi takinum á Gamla Bókasavninum verður vist til hjálagda skriv frá Kristoffer Kristoffersen. 12,5% er lagt aftrat kostnaðarmetingini frá 8/3-82.
2. Tað er av størsta týdningi at fáa øll vindeyguni í Gamla Bókasavninum skift út. Tey eru yvir 50 ára gomul og í ógvuliga ringum

standi. Summi leka, og tað má sigast at vera óforsvarligt at nýta tey meira. Eisini eru tey so illa hita-kuldabjálvað, at nógv kann sparast í olju við nýggjum. Vindeyguni skulu gerast við koblingsrammum, og tað hevur ligið frammarlaga í huganum ikki at broyta útsjóndina av bygninginum.

Um 1 og 2 kann sigast, at her er talan um, at ein almennur bygningur ikki skal forfalla, og hugsast má um, at hetta er ein av prýðiligastu bygningum í Føroyum yvirhøvur. Tak og vindeygu tilsamans kr. 495.000.

3. Eldsløkkingaranlegg við Halon. Bátahøllin er ógvuliga útsett fyri eld. Hetta er træbygningur, og allir veggir eru av træi ella spøn- og pappplátum. Í hesum húsum eru søvn hjá Náttúrugripasavninum (Jarðfrøðisavninum) og Fornminnissavninum. Um arkivið við upplýsingum um havbotn og undirgrund, fuglasavnið hjá Niels á Botni og lutirnir hjá Fornminnissavninum forfarast av eldi, er missurin óbøtiligur.

   Vit hava fingið tilboð frá Tórshavnar Skipasmiðju og C.C. Johansen og meta, at eitt Halonanlegg fer at kosta kr. 370.000 pr. 1. apríl 1983.

4. Í Gamla Bókasavninum eru stór søvn og framsýningar. Hesin bygningur hevur beton millum allar tríggjar hæddirnar og millum øll rúmini, so her er vandin fyri, at alt brennur í grund, um eldur kyknar upp, ikki *so* stórur. Vit hava fingið tilboð og rokna við, at kr. 407.000 verður prísurin fyri eldtrygging av hesum bygningi.

Hesi 4 mál eru sera týdningarmikil, og hesa upphædd verður søkt um eina ferð með alla — ið hvussu so er, má roknast við, at vindeygu og tak fara at halda mong ár framyvir.

Tann eykajáttan, ið søkt verður um, er sostatt kr. 1.273.000.

Tað skal tilskilast, at eldsløkkingaranleggini eisini viðvíkja Fornminnissavninum. Sambært avtalu við Fornminnissavnið søkir Náttúrugripasavnið um hesa játtan fyri báðar stovnarnar.

233051 Innbúgv. Umframt vanligu játtanina kr. 10.000 skulu vit enn eina ferð søkja um kr. 20.000 til keyp av stálskápum til varðveitslu av fugla- og súgdýraskinnum. Um tað tilfar, vit hava, og tað nýggja, sum verður innsavnað, skal liggja trygt móti ljósi, dusti og skaðadýrum, er neyðugt at fáa serlig

arkivskáp. Víst skal verða til, at Dorete Bloch av Løgtingsins Umhvørvisnevnd er biðin um at gera kanningar av skarvi. Um hetta tilfar og annað skal varðveitast forsvarliga, er neyðugt, at henda konto verður hækkað til kr. 30.000.

233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur. Vit skjóta upp, at henda konto verður býtt í tvær, eina til skrivstovuútgerð: pappír o.a. kr. 5.000, og eina til bókakeyp.

233085 Bókakeyp og innbinding. Til handbøkur og t.d. føroyskar náttúrufrøðiligar bøkur kr. 5.000.

253396 Kanningar- og savnarbeiði. Eisini hesa konto ynskja vit at býta sundur í tvær. Kanningar- og savnarbeiði verður sum higartil laboratoriiútgerð, fotoarbeiði, tekniarbeiði, tilfar til framsýningar, serkøn hjálp til eitthvørt. Á hesa konto søkja vit um kr. 90.000. Náttúrugripasavnið hevur fingið eitt relieffkort yvir havbotnin kring Føroyar frá Føroya Sparikassa, virði kr. 250.000. Vit ætla at gera eina framsýning um hetta evni við m.ø. botngrýti, ið er tikið rundan um Føroyar. Við hesi framsýning (Jóannes Rasmussen) umframt tað dagliga viðlíkahald av framsýningum og søvnum verður neyðugt við eini játtan uppá kr. 90.000.

253306 Amboð. Henda konto verður skild frá kanningar- og savnarbeiði. Á hesa konto seta vit tól av ymiskum slag. Í ár eru tvey størri amboð, vit søkja um. Útbygging av einum mikroskopi, vit fingu játtað seinasta ár. Hetta er serútgerð (Differential interferens útbúnaður) til at síggja lutir, smá dýr, pollen o.a., ið ikki sæst í vanligum sjóneykum, umleið kr. 36.000. Boriútgerð. Eitt handbor til at gera kanningar í leysum tilfari, sum t.d. mógvi, kr. 4.000 at byrja við.

---

Sbrt. skriv frá landsverkfrøðinginum dagf. 8. mars 1982:

*Viðv. umvæling av takinum á gamla landsbókasavninum*
Eftir áheitan er gjørd kostnaðarætlan til umvæling av takinum á gamla landsbókasavninum.

Takið hevur verið ótætt í fleiri ár, og ymsar ábøtur hava verið

gjørdar gjøgnum árini fyri at væla um og tetta lekar.

Tað fer ikki at bera til í longdini at væla um í smátum, tí seymurin, sum heldur taksteininum, er tærdur, so at fleiri ferðir eru steinar dotnir av av hesi orsøk.

Tað ber ikki til at umvæla tak til lítar av hesum slag, uttan at alt takið verður tikið av og lagt aftur av nýggjum. Annar máti er at taka hetta takið av og leggja annað úr øðrum tilfari.

Rátt verður tó til, at alt takið verður tikið av, og sama verður lagt á aftur av nýggjum og tørvandi nýggir taksteinar fingnir til vega.

Álítandi inndekningar verða at gera um kvistar.

Neyðugt verður helst eisini at umvæla nakað av takviðinum.

Kostnaðurin av hesi umvæling verður mettur til kr. 120.000,-.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Nýggj vindeygu á Gamla Bókasavninum *ikki* játtað í 1983/84 kr. 360.000.
Eldsløkkingaranlegg (Halon) Bátahøllin *ikki* játtað kr. 383.000.
Eldsløkkingaranlegg (Halon) Gamla Bókasavn ikki játtað kr. 407.000.

---

## Ad § 15-15717: D.G.U. (Danmarks Geologiske Undersøgelse) Føroya Deild

Smbrt. skriv dagfest 22. november 1982 frá Føroya Náttúrugripasavni:

Hervið verður sent inn fíggjarlógaruppskot fyri rakstrarstað 15717 (samarbeiði millum Danmarks Geologiske Undersøgelse og Føroya landsstýri) fyri fíggjarárið 1983/84.

Á fundi 18.11.82 (stýrisnevndin fyri Føroyadeild DGU's og Føroya landsstýri) varð samtykt at senda inn broytingaruppskot í staðin fyri uppskotið, sum sent var inn 19.10.82.

| Kontonummar og navn | | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Endurgjald til ríkið | 210.000 | 210.000 | 210.000 | 210.000 |
| 253459 | Fremmandaveitingar | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| 213806 | Húsaleiga: endurgjald til Náttúrugripasavnið | 70.000 | 70.000 | 70.000 | 70.000 |
| 253396 | Kanningararbeiði (sbr. DGU) | 75.000 | 75.000 | 75.000 | 75.000 |
| | | **415.000** | **415.000** | **415.000** | **415.000** |

**Ad § 15-15755: Fróðskaparsetur Føroya**

Sbrt. skriv dagf. 12. okt. 1982:

**Uppskot til fíggjarætlan 1983/84 fyri rakstrarstað 15755: Fróðskaparsetur Føroya**

Hjálagt verður sent landsstýrinum 2 eintøk av fíggjarætlanaruppskoti fyri stovnin, solciðis sum setursráðið hevur góðkent tað á fundi 1. oktober 1982.

Uppskotið er skipað so:

a) Útfylt oyðubløð frá landsstýrinum — skjal I og II.
b) Yvirlit fyri stovnin sum heild viðv. játtan 1981/82, roknskapi 1981/82, játtan 1982/83 og uppskoti við umsóknum 1983/84, býtt upp í 3 deildir: I Ymiskar inntøkur, II Lønarkonti, III Allar aðrar konti.
c) Viðmerkingar (1-13) til uppskotið 1983/84.
d) Býtið av upphæddunum í uppskotinum 1983/84 á Setursskrivstovu, Gudfrøðideild, Føroyamálsdeild og Støðisútbúgving.

Harumframt verða send landsstýrinum til kunningar 3 eyka fylgiskjøl, A, B og C, við lønarútrokningum.

Í mun til játtan 1982/83 hækkar samlaða uppskotsupphæddin (umsóknir íroknaðar) við 15,1% Hetta inniber samanumtikið lítla og onga broyting í undirvísingarvirkseminum á Fróðskaparsetrinum; harafturímóti kann granskingin mennast sbrt. uppskotinum.

Fíggjarætlanarmetingarnar fyri 1984/85 og 1985/86 verða sendar landsstýrinum, so skjótt sum setursráðið hevur havt høvi til at taka endaliga støðu til tær.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 84/85 í 1000 kr. | Ætlan 85/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | ÷ 20.3 | ÷ 20.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25,0 | ÷ 25,0 | ÷ 25,0 |
| 103127 | Løn/lærarar | 315.8 | 367.0 | 391.0 | 391,0 | 391,0 | 391,0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 862.6 | 1.017.5 | 1.195.0 | 1.195,0 | 1.195,0 | 1.195.0 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 1.813.4 | 2.004.0 | 2.291.0 | 2.228,0 | 2.228,0 | 2.228,0 |
| 103288 | Løn/onnur | 85.4 | 109.0 | 78.0 | 78,0 | 78,0 | 78,0 |
| 103509 | Samsýningar | 42.6 | 43.0 | 65.0 | 65,0 | 65,0 | 65,0 |
| 113202 | Ferða-/dagpeningur innanlands | 62.2 | 75.5 | 22.0 | 22,0 | 22,0 | 22,0 |
| 113243 | Ferða-/dagpeningur uttanlands | | | 66.0 | 66,0 | 66,0 | 66,0 |
| 123103 | Skeið | 3.0 | 12.0 | 12.0 | 12,0 | 12,0 | 12,0 |
| 133053 | Fólkatrygging | 1.9 | 4.0 | 6.0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| 203308 | Lýsingar | 17.1 | 16.0 | 20.0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 203403 | Dagbløð, tíðarrit v.m. | 8.4 | 12.5 | 13.0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| 213408 | Umvælingar | 9.0 | 9.0 | 12.0 | 12,0 | 12,0 | 12,0 |
| 213503 | Umsiting | 10.0 | 30.0 | 50.0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 87.7 | 90.0 | 112.0 | 112,0 | 112,0 | 112,0 |
| 233051 | Innbúgv | 42.1 | 24.0 | 29.0 | 29,0 | 29,0 | 29,0 |
| 233155 | Prentlutir | 8.4 | 21.5 | 17.0 | 17,0 | 17,0 | 17,0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233259 | Postgjald ..... | 14.9 | 16.0 | 19.0 | 19,0 | 19,0 | 19,0 |
| 233354 | Telefon ..... | 42.9 | 52.0 | 61.0 | 61,0 | 61,0 | 61,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur ..... | 23.8 | 31.0 | 38.0 | 38,0 | 38,0 | 38,0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding ..... | 55.6 | 52.0 | 57.0 | 57,0 | 57,0 | 57,0 |
| 253306 | Amboð ..... | 38.5 | 39.0 | 50.0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútreiðslur ..... | 57.5 | 90.0 | 80.0 | 80,0 | 80,0 | 80,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 62.3 | 50.0 | 111.0 | 61,0 | 61,0 | 61,0 |
| | | **3.644.8** | **4.145.0** | **4.770.0** | **4.657,0** | **4.657,0** | **4.657,0** |

**Viðmerkingar til uppskot til figgjarætlan 1983/84**

1) *Ymiskar inntøkur* = tilmeldingargjald til almenn kvøldskeið. — Er í 1982 hækkað úr 100 kr. upp í 150 kr. fyri hvørja tilmelding.

2) *Løn/lærarar* = undirvísingarhjálp frá leysalærarum.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Læraraskeið setursins: | um 535 | undirvísingartímar | = | 133.0 |
| Almenn kvøldskeið: | — 480 | — | = | 85.0 |
| Gudfrøðideild: 310./.60 +) | — 250 | — | = | 52.0 |
| Føroyamálsdeild: 30 + 15 t. | — 45 | — | = | 12.0 |
| Støðisútbúgving ..... | — 520 | — | = | 109.0 |
| Leysalærarar tilsamans | um 1830 | undirvísingartímar | = | **391.0** |

+) Verður umsókn a) í viðm. 4) *ikki* játtað, hækkar undirvísingartímatalið við uml. 60, svarandi til 15.000 kr.
Játtan 1982/83 svarar til um 1870 leysalæraratímar.
Neyv útrokning av tilætlaðum útreiðslum til undirvísingarhjálp fíggjarárið 1983/84 er sett upp í fylgiskjali A.

3) *Løn/starvsfólk*
Normering 1982/83:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Setursskrivstovan | - 4 | starvsfólk | í 3 11/21 | starvi ..... | 521.0 |
| Føroyamálsdeild | - 3 | — | í 2 1/2 | — ..... | 343.5 |
| Støðisútbúgving | - 2 | — | í 1 1/2 | — ..... | 211.0 |
| *Starvsfólk tils.* (sbrt. útrokning í fylgiskjali B) ..... | | | | | 1.075.5 |

Aftrat verður at leggja tilsøgn um uppnormering av setursskrivarastarvinum ..... 25.0
Harumframt fevnir uppskotsupphæddin um hesar *umsóknir um nýjáttan:*
a) Setursskrivstovan søkir um, at starvsnormeringin verður 3 3/4 (í løtuni 3 11/21), meirútreiðsla ..... 32.0
b) Føroyamálsdeildin søkir um, at partur av tímalønta hjálpararbeiðinum verður skipað sum hálvt fast starv, við orðasavnsarbeiði, útskriving og øðrum fyrifallandi á deildini. Í 9. lønarflokki á 6.-8. st. verður meirútreiðslan á 103143 ..... 62.5
(Samstundis lækkar 103288 við 620 t., sí viðm. 5)
**Løn/starvsfólk tils.** ..... **1.195.0**

*4) Løn/sáttmálaløn*

Normering 1982/83: Setursskrivstovan 1 viðbót (til leysalærarar fyri fakliga ábyrgd og tilrættalegging av læraraskeiðum) ... 25.0
Føroyamálsdeild 4 størv ..... 1.017.0
Støðisútbúgving 4 — ..... 957.0
Gudfrøðideild 1/2 starv ..... 121.0

*Starvsfólk tils.* (sbrt. útrokning í fylgiskjali C) ..... 2.120.0

Harumframt *endurnýggjar* setrið *hesar umsóknir* frá okt. 1981:

a) at leiðarin á Gudfrøðideild verður settur í fult starv frá 1.8.83 at rokna, t.e. 8 mán. í 83/84, meirútreiðsla á 103168 (sbr. í hesum sambandi viðm. 2 um Gudfrøðideild) ..... 63.0
Setanartreytirnar fyri leiðarastarvi eru: Daglig leiðsla av deildini, undirvísingar- og granskingarskylda. Í hálvum starvi er at kalla ógjørligt at lúka treytina um gransking.

b) at Fróðskaparsetrið fær eitt kandidatstipendium at ráða yvir til, eftir umsókn, at lata føroyskum kandidatum, sum fara undir vísindaliga framhaldsútbúgving og/ella serligar granskingaruppgávur, í fyrsta lagi við setrið, í øðrum lagi við hægri lærustovnar aðrastaðni, frá 1.8.83 at rokna, t.e. 8 mán. í 1983/84, meirútreiðsla ..... 108.0
Setrið metir, at møguleikin at veita kandidatstipendium kann gerast týðandi liður í at menna føroyska gransking.

**Løn/sáttmálaløot tils.** ..... **2.291.0**

5) Uppskotsupphæddin fevnir um:

| | |
|---|---|
| Frítíðaravloysara á Setursskrivstovuni ..... | 12.0 |
| Tímalønta partin av hjálpararbeiðinum í sambandi við høvuðssøvnini á Føroyamálsdeild, 700 t. á 65 kr. ..... | 46.0 |
| Programmeringshjálp í Støðisútbúgving í sambandi við rannsóknir, 300 t. á 65 kr. ..... | 20.0 |
| **Løn/onnur tils.** (svarandi til 1200 t.) ..... | **78.0** |

Upphæddin er at samanbera við játtan 82/83: 109.000., ið svarar til 1820 t. Til fyritreyt hevur henda lækking játtan av hálvum føstum starvi á Føroyamálsdeild, sí viðmerking 3).

6) *Samsýningar*

Upphæddin svarar til:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Almennar fyrilestrar á Fróðskaparsetrinum | | 18 × 750 = 13.5 | |
| — — uttan fyri Havnina | | 10 × 750 = 7.5 | |
| — — teknisk hjálp | | = 2.0 | 23.0 |
| Prógtøkusamsýningar: | Føroyamálsdeild | 12.0 | |
| | Støðisútbúgving | 20.0 | |
| | Gudfrøðideild | 5.0 | 37.0 |
| Ymist ..... | | | 5.0 |
| **Samsýningar tils.** ..... | | | **65.0** |

Hækkingin a hesi konto stavar at kalla øll frá nýggju skipanini við prógtøkum á Støðisútbúgvingini.

7) *Ferða- og dagpeningur*

Veruliga hækkingin er á innanoyggja ferðing (innsavningarferðir, ekskursiónir við næmingum, kmendurgjald o.t.). Meginparturin av ferðaútreiðslunum á konto uttanlands hevur tilknýti til samstarv við útlendskar, serstakliga norðurlendskar stovnar. Sostatt fara gestalærara- og prógdómaravitjanir uttaneftir eisini av hesi konto.

8) *Umvælingar*
Hetta er meting, gjørd í samráð við húsavørðin, av neyðugum umvælingum av húsunum í J.C. Svabosgøtu 7 (arbeiðs- og skrivstovuhøli hjá Støðisútbúgvingini).

9) *Leiguútreiðslur*
Upphæddin fyri Føroyamálsdeildina fer 1.4.83 úr 30.000 kr. upp í 42.000 kr. um árið.
Í sambandi við leinging av leigusáttmála fyri J.C. Svabosgøtu 19 (undirvísingarhøli hjá Støðisútbúgving) verður roknað við eini hækking upp á 10-12.000 kr. um árið.

10) *Telefon*
Umfram vanliga nýtslu fevnir upphæddin um nýggjan telefonvekslara á Støðisútbúgving.

11) *Amboð*

| | |
|---|---|
| Til tólkeyp á Støðisútbúgvingini | |
| 1) alisfrøði (til at taka) ..... | 20.0 |
| 2) evna-/lívfrøði (3 ávís tól) ..... | 25.0 |
| Til tólkeyp á Støðisútbúgvingini 1) alisfrøði (til at taka) .... | 20.0 |
| 2) evna-/lívfrøði (3 ávís tól) . | 25.0 |
| — — - Føroyamálsdeildini ..... | 5.0 |
| **Amboð tilsamans** ..... | **50.0** |

12) *Aðrar umsitingarútreiðslur*

| | |
|---|---|
| Rakstur av tólum á Støðisútbúgving 1) alisfrøði ..... | 20.0 |
| 2) evna-/lívfrøði .... | 30.0 |
| 3) dá/hag/støddfrøði | 30.0 ×) |
| **Aðrar umsitingarútreiðslur tilsamans** ..... | **80.0** |

×) Henda upphædd er í minna lagi, um so er, at Støðisútbúgvingin fær nýggj dátutól (fyri studning, deildin hevur í umbúna at søkja).

13) *Aðrar útreiðslur*
Umfram vanligu upphæddirnar á hesi konto (sum á uppskotinum 1983/84 svara til 61.000 kr. tilsamans) *søkir Fróðskaparsetrið* við hesum *um eina serjáttan uppá 50.000 kr.* til at rinda einum arkitekti fyri kanning av hølistørvi og gerð av kostnaðarætlan fyri nýbygging.

Fyrst og fremst verður hugsað um tey sera trongu hølisviðurskiftini hjá Fiskirannsóknarstovuni, ið sum kunnugt hevur innivist í húsunum, setrið eigur á Debesartrøð. Síðani kemur Fróðskaparsetrið sjálvt, sum heldur til í 4 ymiskum húsum. Setrið hevur tikið málið upp og samráðst við Fiskirannsóknarstovuna, ið tekur fult undir við, at setrið roynir at loysa hølistørvin við bygging á tøkum øki við Sjómansskúlan.

Arkitektkanningin er fyrsta stig í hesum átroðkandi máli.

**Býtið av upphæddunum í uppskotinum fyri 1983/84 við umsóknum**

SSS: Setursskrivstova (miðfyrisiting, læraraskeið, almenn kvøldskeið, almennir fyrilestrar)
GFD: Gudfrøðideild (fyrireikandi prógvlestur í gudfrøði, gransking) — umsitingarútreiðslur á SSS
FMD: Føroyamálsdeild (prógvlestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, orðabókaarbeiði, innsavning, gransking, ráðgeving)
STB: Støðisútbúgving (náttúruvísindalig støðisútbúgving við prógvtøkum, gransking, ráðgeving)

| | | | SSS | GFD | FMD | STB |
|---|---|---|---|---|---|---|
| I | 83904 | Ymiskar inntøkur ... | ÷25.0 | | | |
| II | 103127 | Løn/lærarar ..... | 218.0 | 52.0 | 12.0 | 109.0 |
| | 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 578.0 | | 406.0 | 211.0 |
| | 103168 | Løn/sáttmálaløn ... | 133.0 | 184.0 | 1.017.0 | 957.0 |
| | 103288 | Løn/onnur ..... | 12.0 | | 46.0 | 20.0 |
| | 103509 | Samsýningar ..... | 25.0 | 5.0 | 15.0 | 20.0 |
| | | Lønarkonti tils. | 966.0 | 241.0 | 1.496.0 | 1.317.0 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| III | 113202 | Ferða-/dagp. innanl.. | 5.0 | 3.0 | 9.0 | 5.0 |
| | 113243 | — — uttanl. | 11.0 | 5.0 | 30.0 | 20.0 |
| | 123103 | Skeið ..... | | | 12.0 | |
| | 133053 | Fólkatrygging ..... | 6.0 | | | |
| | 203308 | Lýsingar ..... | 20.0 | | | |
| | 203403 | Dagbløð, tíðarrit v.m. | 3.0 | | 6.0 | 4.0 |
| | 213408 | Umvælingar ..... | 2.0 | | 2.0 | 8.0 |
| | 213503 | Umsiting ..... | | | | 50.0 |
| | 213806 | Leigu útreiðslur ..... | | | 42.0 | 70.0 |
| | 233051 | Innbúgv ..... | 16.0 | | 8.0 | 5.0 |
| | 233155 | Prenthutir ..... | 8.0 | | 4.0 | 5.0 |
| | 233259 | Postgjald ..... | 10.0 | | 4.0 | 5.0 |
| | 233354 | Telefon ..... | 17.0 | | 19.0 | 25.0 |
| | 233561 | Aðrar skrivstovuútr.. | 12.0 | | 17.0 | 9.0 |
| | 253085 | Bókakeyp og innbind. | 4.0 | 8.0 | 20.0 | 25.0 |
| | 253306 | Amboð ..... | | | 5.0 | 45.0 |
| | 253314 | Aðrar umsitingarútr.. | | | | 80.0 |
| | 253903 | Aðrar útreiðslur .... | 80.0 | | 30.0 | 1.0 |
| | | Aðrar konti tilsamans | 194.0 | 16.0 | 208.0 | 357.0 |
| | | **Rakstrarstað 15755 tilsamans** | **1.135.0** | **257.0** | **1.704.0** | **1.674.0** |

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Serjáttan upp á 50.000 kr. til rindan av arkitekti ikki játtað.
1/2 starv til leiðara á gudfrøðideildini ikki játtað.

Skjøl til skjals á landsskrivstovuni.

**Ad § 15-15793: Stovnar á Debesartrøð**

Sbrt. skriv móttikið 28. oktober 1982:

Hjálagt verður — við góðkenning stovnanna — send landsstýrinum uppskot til fíggjarætlan 1983/84 fyri rakstrarstað 15793: Stovnar á Debesartrøð.

Uppskotið er samskipað av setursskrivstovuni, ið sum kunnugt hevur umsitingina av felagsrakstrinum um hendur.

Í fíggjarárunum 1984/85 og 1985/86 verður roknað við somu upphæddum sum í 1983/84 uppskotinum.

**Stovnar á Debesartrøð - 15793**

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot lands-stýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk ..... | 124.685,18 | 136.0 | 138.4 | 138.4 | 138.4 | 138.4 |
| 103151 | Løn - avloysarar ..... | 0,00 | 9,5 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 103222 | Løn - reingerð ..... | 220.952,00 | 249.0 | 270.4 | 270.4 | 270.4 | 270.4 |
| 103288 | Løn - onnur ..... | 99.899,79 | 110.5 | 224.2 | 117.9 | 117.9 | 117.9 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 278.800,95 | 429.5 | 449.3 | 449.3 | 449.3 | 449.3 |
| 213408 | Umvælingar v.m. ..... | 12.750,35 | 15.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 19.849,0 | 20.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur .... | 10.360,00 | 23.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 0,00 | 0,0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur .. | 52.370.11 | 57.5 | 66.0 | 66.0 | 66.0 | 66.0 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútreiðslur . | 0,0 | 0,0 | 25.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 253355 | Umsiting av Debesartrøð ... | 9.983,66 | 10.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 6.440,00 | 8.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253306 | Amboð ..... | | | 125.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| | | **836.091.0** | **1.068.0** | **1.403.3** | **1.147.0** | **1.147.0** | **1.147.0** |

## Uppskot til fíggjarætlan 1983/84:
## Rakstrarstað 15793: Stovnar á Debesartrøð

*Viðmerkingar til kt.:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103143 | *Løn/starvsfólk*, t.e. húsavørðurin á øllum stovnum og deildum, løntur í 9. lfi. í Starvsmannafelagssáttmálanum, 1.5.83 á 14. stigi (sbr. annars kt. 103288). Løn við prístali 1.7.82 uml. | 130.055 | |
| | Frítíðargjald 1,5% av 1982-løn uml. | 1.950 | |
| | 5 prístalsviðbøtur | 6.300 | |
| | | 138.305 | 138.4 |
| 103151 | *Løn/avloysarar* fyri húsavørðin í summarfrítíðini, mett til 170 t. á 55/- + 9,5% frítíðarløn | 10.000 | 10.0 |
| 103222 | *Løn/reingerð:* 4 vaskikonur við løn fyri tils. 4215 tímar um árið í seturhúsunum (Føroyamálsdeild, Fiskirannsóknarstovan, búrúm), starvsstovuhúsum (setursskrivstova, Heilsufrøðilig Starvsstova, Landsskjalasavn), J.C. Svabosg. 7 og 19 (Støðisútbúgvingin) við prístali 1.7.82 (50,36 í 1,70) × 4215 | 219.433 | |
| | Frítíðargjald 1,5% av 1982-løn uml. | 3.000 | |
| | Mett lønarhækking | 10.894 | |
| | Høvuðsreingerð 350 t. á 65,- + 9,5% frítíðarløn | 25.000 | |
| | Avloysaraløn 200 t. á 55/- + 9,5% frítíðarløn uml. | 12.000 | |
| | | 270.327 | 270.4 |
| 103288 | *Løn/onnur* t.e. | | |
| | a) umsjónarmaður, sum røkir Debesartrøð fyri arbeiðsmannamánaðarløn. Við juli 82-prístali svarandi til ársløn uml | 106.000 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | b) hjálparmaður til húsavørðin, m.a. til at røkja Müllerstrød, at arbeiða fyri arbeiðsmannamánaðarløn, við juli 82-prístali svarandi til árløn ..... | 106.000 | |
| | *Viðm.:* Grundgevingin fyri umsókn um b) hjálparmann er tann sama sum seinasta ár, at húsavørðurin ikki kemur uppfyri at røkja alt, ið er lagt undir húsavarðarskipanina, m.a. at røkja økið uttan um Landsbókasavnið (Poul Müllers trød) mett lønarhækking fyri a) og b) ..... | 10.000 | |
| | c) maður, ið hevur flaggingina undir hond fyri fasta árliga samsýning ..... | 2.200 | |
| | | 224.200 | 224.2 |
| 213105 | *El, hiti og vask* | | |
| | *El:* Felagsmálari fyri alla nýtslu á stovnunum uttan Forminnissavnið )Postmeistarahúsið), J.C. Svabosg. 7 og 19 og Landsbókasavnið. | | |
| | Nýtsla 1981/82: 145.960 kWt, kW-gjald 2.998 kr. | | |
| | 1982/83 meting: kW-gjald ..... | 3.500 | |
| | 150.000 kWt á 1/100 ..... | 150.000 | |
| | J.C. Svabosgøta 7 og 19 ..... | 25.000 | |
| | | 178.500 | |
| | *Hiti:* Setursshús (a), Starvsstovuhús (b), J.C. Svabosgøta (c). | | |
| | Ávist 81/82 a) 18. 75 ltr. 80/81 a) 18.309 | | |
| | b) 34.310 — b) 41.854 | | |
| | c) 5.569 — cc) 5.855 | | |
| | 58.134 ltr. 66.018 | | |
| | 1983/84 meting: 75.000 l. á 3/75 ..... | 281.250 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | *Vask:* Samkeyp 81/82 av tí, omanfyri nevndu 4 vaskikonur nýta (nýtsla 1981/82 8.480 kr.) | | |
| | 1983/84 meting ..... | 9.500 | |
| | El, hiti og vask tilsamans ..... | 469.250 | |
| | — leiguinntøkur fyri búrúm mettar til ... | 20.000 | |
| | | 449.250 | 449.3 |
| 213408 | *Umvælingar:* Ymist, sum húsavørðurin skipar fyri undir einum, t.e. bert útreiðslur, ið ikki ella illa fáast liðaðar sundur millum stovnarnar; harumframt amboð til húsavørðin ..... | 20.0 | |
| 213702 | *Ognartrygging.* Brunatrygging fyri starvsstovuhúsini, virði 8,8 mill. kr. tryggingargjald + mett hækkan 12,5% ..... | 25.0 | |
| 213901 | *Ymsar húsaútreiðslur* | | |
| | Kloakkreinsan og viðlíkahald ..... | 4.500 | |
| | Kaminreinsan (øll húsini) ..... | 2.500 | |
| | Oljufýrservice + viðlíkahald av hitastýring | 5.000 | |
| | Viðlíkahald av fløggum og flaggstong ... | 2.000 | |
| | Náttarvakt um vikuskifti ..... | 8.000 | |
| | Óvæntaðar húsaútreiðslur ..... | 3.000 | |
| | | 25.000 | 25.0 |
| 233561 | *Aðrar skrivstovuútreiðslur* | | |
| | Leiga og nýtsla av 2 Xerox-tólum til allar stovnar uttan Landsskjalasavnið og Landsbokasavnið ..... | 46.700 | |
| | Leiga av 12 teljarum á 90/- ..... | 1.080 | |
| | Tilfar ..... | 18.000 | |
| | | 65.780 | 66.0 |

| | | |
|---|---|---|
| 253355 | *Umsiting av Debesartrøð*<br>Planting og tilfar til at halda trøðna í góðum standi ..... | 15.0 |
| 253306 | *Amboð*<br>Stovnarnir taka uppaftur umsókn í uppskoti til fíggjarlóg 1980/81 og 1981/82 um keyp av bili (sí hjálagda bræv dagf. okt. 1979) ..... | 125.0 |
| 253314 | *Aðrar umsitingarútreiðslur*<br>Útreiðslur til rakstur av felags bili tils. ... | 25.0 |
| 253903 | *Aðrar útreiðslur* at taka til ..... | 10.0 |
| | | 1.403.3 |

**Viðmerkingar frá landsstýrinum:**
1 bilur, 125.000 kr. ikki játtaðar.
Aðrar umsitingarútreiðslur 25.000 ikki játtaðar.
Hjálparmaður til húsavørðin ikki játtaður.

**Ad § 15-15805: Heilsufrøðiligt Starvsstova**

Sbrt. skriv dagf. 4. okt. 1982.

*Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84 og metingar um 1984/85 og 1985/86*
Á fundi 1. okt. 1982 á starvsstovuni varð avgjørt at senda landsstýrinum soljóðandi uppskot til fíggjarætlan 1983/84:

## Rakstrarstað 15805 Heilsufrøðiliga Starvsstovan

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Prislega 1983/84 (ikki hækkað við 12 1/2) Ætlan 84/85 í 1000 kr. | Ætlan 85/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur ..... | ÷ 113,6 | ÷ 60.0 | ÷ 100.0 | ÷ 300.0 | ÷ 300.0 | ÷ 300.0 |
| 103143 | Løn - starvsfólk ..... | 444,2 | 556,2 | 650.0 | 650.0 | 650.0 | 650.0 |
| 103151 | Løn - avloysarar ..... | 55,5 | 55.0 | 140.0 | 55.0 | 55.0 | 55.0 |
| 103168 | Løn - sáttmálalønt ..... | 222,9 | 391.8 | 782.0 | 422.0 | 422.0 | 422.0 |
| 103288 | Løn - onnur ..... | 15,3 | 20.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 103405 | Úrtíðarløntir ..... | 4,8 | 5.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur innanl. | 10,7 | 15.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 203308 | Lýsingar ..... | 8,0 | 8.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 213503 | Umsiting ..... | 0,4 | 36.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 1,7 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 |
| 233155 | Prentlutir ..... | 5,6 | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233259 | Postgjald ..... | 4,7 | 5.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 |
| 233354 | Telefon og telex ..... | 24,0 | 26.0 | 36.0 | 36.0 | 36.0 | 36.0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp ..... | 0,0 | 10.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur .. | 15,2 | 15.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding .... | 35,9 | 26.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 253306 | Amboð ..... | 123,3 | 60.0 | 200.0 | 525.0 | 200.0 | 200.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 253371 | Rannsóknir ..... | 229,6 | 50.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 35,3 | 35.0 | 45.0 | 45.0 | 45.0 | 45.0 |
| 253928 | Tænastuakfør, rakstur ..... | 11,5 | 12.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253936 | Laboratoriurakstur ..... | 181.7 | 130.0 | 190.0 | 175.0 | 175.0 | 175.0 |
| | | **1.317,7** | **1.407.0★** | **2.211.0** | **1.876.0** | **1.551.0** | **1.551.0** |

Brúkt % 1981/82 111% (96,3% excl. royndir at nýta svartkj.)
1980/81 108% (85,3% — — — — —
1979/80 85%
1978/79 94%

★ **NB:**
Harafturat er 14. sept. 1982 søkt um eina eykajáttan uppá 161.000 kr.

**Viðmerkingar:**
Sagt skal verða alt fyri citt, at starvsstovan følir seg ikki at vera bundna av at nýta allar játtanir, um so er, at mett verður í sjálvum fíggjarárinum, at ein játtan ella ein partur av cini játtan ikki nýtist at verða nýttur.

Somuleiðis um broytingar verða gjørdar, er ynskiligt, at landsstýrið og fíggjarnevndin tala við starvsstovuna.

*83904 Ymiskar inntøkur*
Væntandi hækka inntøkurnar við kr. 10.000 til 70.000 við núverandi manning. Við øktari manning mett til 100.000 kr.

*103143 Løn - starvsfólk*

| | Játtan 1982/83 | Uppskot 1983/84 |
|---|---|---|
| A. Skrivstovufólk (9. lfl.) | 117,2 | 128,3 |
| B. Hospitalslaborantur (12. lfl.) | 128,2 | 140,2 |
| C. Laboratoriuteknikari (12. lfl.) | »134,5« | 128,1 |
| D. Laborantur (9. lfl.) | 112,4 | 115,4 |
| E. Hospitalslaborantur (12. lfl.) hálvan dag | 63,8 | 69,0 |
| F. Laborantur — hálvan dag | — | 69.0 |
| | **556,1** | **650,0** |

Lønirnar eru pr. 1. juli 1982 + 5 dýrtíðarviðbøtur.

---

Viðvíkjandi laboranti F, sum er hálvur laborantur í sambandi við mjólkarkanningar, verður víst til umsókn um eykajáttan dagfest 14. sept. 1982.

*103151 Løn - avloysarar*

Søkt verður um kr. 140.000, sum er ein hækking uppá kr. 85.000.

Meting:

| | | |
|---|---|---|
| 2 × 1 barsilsvikariat á 3 mðr. | á 10.000 kr. . . . | 60.000 kr. |
| 4 × 1 summarfrítíðaravloysarar | á 10.000 — . . . | 40.000 — |
| 2 × 1/2 summarfritíðaravloysara | — 5.000 — . . . | 10.000 — |
| 2 × 1 sáttmálasett | — 15.000 — . . . | 30.000 — |
| | **Tils.** | **140.000 kr.** |

*103168 Løn - sáttmálasett*

| | Játtan 1982/83 | Uppskot 1983/84 |
|---|---|---|
| A. Deildarleiðari (sáttmáli millum Før. Verkfrøðingafelag og Før. Landsstýri) íroknað pensjónsgjald, 5 før. dýrtíðarviðbøtur og leiðaraviðbót . . . . . | 195,8 | 219,4 |
| B. Deildarleiðari (samb. sáttmála millum Finansministeriet og Dansk Dyrlægeforening) íroknað 5 danskar dýrtíðarviðbøtur, deildarleiðaraviðbót og pensjónsgjald . . . . . | 196,0 | 202,6 |
| C. Kemikara á miljø/kemi deildini . . . . . | | 190,0 |
| D. Eftirlitsmaður . . . . . | — | 170,0 |
| | **391,8** | **782,0** |

Lønirnar pr. 1. juli 1982 + 5 dýrtíðarviðbøtur.

Spurningurin um sáttmálasett fólk (D. møguliga ein millumteknikari) má viðgerast saman við landsstýrinum.

Ein kemikari (C.) skal arbeiða við analysuspurningum í sambandi við miljø og kemi kanningum. Ein partur av hesum arbeiði verður umbiðið arbeiði, sum kemur at økja um inntøkurnar hjá starvsstovuni.

Ein eftirlitsmaður (D.), sum møguliga kann verða ein millumteknikari, skal útføra tað praktiska eftirlitið við flakavirkjum, fiskiførum og alistøðum í sambandi við løggilding. Hesin skal eisini í samstarv við Vrakarastovnin tryggja regluliga tøku av prøvum frá flakavirkjum og skipum. Kanningar av ymiskum prøvum er grundarlagið

fyri teimum váttanum, sum starvsstovan letur í sambandi við útflutning av fiskavørum.

Tann økta góðskingin (liðugtvørur v.m.) krevur størri eftirlit.

Landsstýrið og løgtingsins fíggjarnevnd eigur at umhugsa hendan spurningin og gera sær m.a. greitt, at deildarleiðararnir á starvsstovuni meta, at grundarlagið fyri teim ymisku váttanunum fyri fiskavørur til útflutnings er við at gerast nakað tunt.

Vit meta, at støðan kann gerast so álvarslig, at vit ein dag ikki longur verða før fyri at verða útflytarum til hjálpar við ymiskum váttanum.

*103288 Løn - onnur*
Søkt verður um 25.000 kr., sum er ein hækking uppá 5.000 kr. Kontoin verður nýtt til ymsar útreiðslur í sambandi við eftirlit og tøku av prøvum og tímaløntum uppvaskihjálp.

*103405 Úrtíðarlønir*
Søkt verður um 10.000 kr., sum er ein hækking uppá 5.000 kr. Víst verður til roknskapin pr. 2.8.82, sum vísir, at 4.347,45 kr. longu eru nýttar av teim játtaðu 5.000 kr.

*113202 Ferða- og dagpeningur innanlands*
Vísandi til konto 103168 pkt. D. (eftirlitsmaður) verður søkt um eina øking uppá 10.000 kr., tilsamans 25.000 kr.

*203308 Lýsingar*
Søkt verður um 10.000 kr., sum er ein hækking uppá 2.000 kr.

*213503 Umsiting av Starvsstovuhúsinum*
Biðið verður um at fáa flutt tær 36.000 kr. til næsta ár, og søkt verður um eina hækking uppá 4.000 kr., tilsamans 40.000 kr.

Ætlanin var, at Starvsstovuhúsini skuldu málast í summar, men nú er so langt útliðið, at hetta neyvan kann gerast í ár.

Eingin peningur er nýttur á hesi konto í ár.

*213702 Ognartryggingar*
Óbroytt.

*233155 Prentlutir*
Óbroytt.

*233259 Postgjald*
Søkt verður um eina hækking uppá 2.000 kr. til 7.000 kr.

*233354 Telefon og telex*
Søkt verður um eina hækking uppá 10.000 kr. til 36.000 kr. í sambandi við nýtt telefonsystem.

*233054 Sakkøn hjálp*
15.000 kr.

*233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur*
Søkt verður um eina hækking uppá 5.000 kr. til 20.000 kr. í sambandi við uppsetan av einum samtaluanleggi.

*253085 Bókakeyp og innbinding*
Søkt verður um eina hækking uppá 4.000 kr. til 30.000 kr. Týdningurin at hava eitt gott stovnsbókasavn má ikki undirmetast. Einans tíðarritini (íroknað abstracts) kosta umleið 19-20.000 kr. Fakbøkur eru dýrar, í meðal uml. 300 kr./stk. 25-30 fakbøkur + neyðug tíðarrit má sigast at vera avgjørt minstamark fyri tørvi okkara.

*253306 Amboð*
Í 1981/82 var apparatur keypt til 124.329,83 kr. (játtan 125.000 kr.). Tollurin á apparaturinum uppá 24.000 kr. var tikin av játtanini 1982/83. Viðv. 1982/83 verður víst til umsókn um eykajáttan dagfest 14. sept. 1982.

Søkt verður um 200.000 kr., sum eitt hækking uppí 75.000 kr. samanborið við 1981/82 (lla 40.000 kr. samanborið við játtan 1982/83 uppá 60.000 kr. + umsókn um eykajáttan dagfest 14. sept. 1982 uppá 100.000 kr.

*253371 Rannsóknir*
Søkt verður aftur í ár um 60.000 kr. (hækking uppá 10.000 kr.) til ymiskar royndir.

*253903 Aðrar útreiðslur*
Søkt verður um 45.000 kr., sum er ein hækking uppá 10.000 kr. Starvsstovan kemur møguliga at søkja um eykajáttan seinni, um tað verður dýrari at installera gassrørsystem á laboratoriini, fyri at sleppa undan at hava 6-7 gasssløg í trykkfløskum á sjálvum laboratoriinum (Hydrogen Nitrogen, Carbon dioxid, Acetylen, Dinitrogenoxid,

Argon). Ynskiligt er at fáa hesi gassløgini í serligt skúr uttanfyri eins og nú fyri Kosangas.

Sama ger seg galdandi, um neyðugt verður at installera fleiri stinkskáp á laboratoriinum (Arbeiðseftirlitið).

*253928 Tænastuakfør*
Søkt verður um 15.000 kr., sum er ein hækking uppá 3.000 kr.

*253936 Laboriatoriurakstur*
Søkt verður um 190.000 kr., sum er ein hækking uppá 10.000 kr. í mun til játtanina 1982/83 og umsókn um eykajáttan dagfest 14. sept. 1982 uppá 50.000 kr.

**Viðmerkingar til metingarnar fyri 1984/85 og 1985/86:**
Prislegan er tann sama sum fyri 1983/84. Roknað er ikki við hækkingum, sum kunnu fara fram í sambandi við nýggjar lógir ella í sambandi við broytingar í lógum.

Ein av trupulleikunum er, at sjálvt um starvsstovan kann gera nógv umbiðið arbeiði eftir rokning fyri ymsar stovnar, so kann inntøkan av slíkum arbeiði ikki nýtast til setan av fleiri fólkum. Úrslitið verður so, at nakað av arbeiðinum, sum kundi verið gjørt, verður útsett.

Roknast má við fleiri fólkum í komandi árum. Neyðugt er, at starvsstovan skjótast til ber fær ein kemikara (t.d. farmaceut) og ein veteriner. Somuleiðis verður neyðugt við fleiri laborantum.

Amboðskontoin má verða uppá minst 200.000 kr./árl. í komandi árum, fyri at starvsstovan kann fáa høvi til at verða hóskandi útgjørd til sína uppgávu.

Roknast má við, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan fyrr ella seinni skal hava ein minni bil, sum er serliga útgjørdur til prøvatøku av ymiskum slag (mett til 145.000 kr. í 1985/86).

**Sbrt. skriv dagf. 9. nov. 1982 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni:**
Vísandi til umsókn um eykajáttan dagfest 14/8-82 og uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84 dagfest 4/10-82, verður hervið hjálagt víst á døni um fyrispurning til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um at gera regluligar kanningar. Viðmerkjast skal, at tað her er talan um týdningarmiklar eftirlitskanningar, ið koma at økja um inntøkuna hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Vónandi verður hesin tátturin eisini tikin við, tá uppskotið um setan

av einum hálvdags laboranti afturat á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verður viðgjørdur í sambandi við fíggjarløgtingslógina 1983/84.

Sagt verður frá hesum.

**Sbrt. skriv frá landsskúlafyrisitingini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna:**
Við jøvnum millumbilum sendir starvsstovan Landsskúlafyrisitingini úrslit av kanningum av vatni úr svimjihylum í ávísum skúlum í landinum.

Landsskúlafyrisitingin metir, at tað hevði verið ein fyrimunur, um henda kanning kundi verið gjørd í øllum svimjihylum í landinum, sum verða nýttir til undirvísingarbrúk, og fer tí við hesum at spyrja starvsstovuna, um hetta kann lata seg gera, og hvat kostnaðurin av hesum verður bæði samlað og fyri hvønn hylin sær.

Hesir svimjihyljar eru til undirvísingarbrúks:
Í skúlanum í Vági
— — Á Tvøroyri
á Meginskúlanum á Sandi (bert í nýtslu 6 mánaðir um árið)
í Gøtu skúla — — — — — — —
Svimjihøllin í Klaksvík
— í Tórshavn
Í skúlanum í Sørvági
— — í Leirvík

Í skúlanum í Sørvági
— — —Leirvík
— — —Fuglafirði
— — —Vestmanna
— — —Kvívík
— — á Toftum
— — —Strondum
— — —Argjum
— — —Trøðni
Í Eysturskúlanum og
í Felagsskúlanum á Oyrarbakka

**Sinbrt. skriv dagfest 9. uovember 1982 til Heilsufrøðiligu starvsstovuna frá landsskúlafyrisitinginl:**
Víst verður til skriv frá Landsskúlafyrisitingini dagfest 21/10-82 við-

víkjandi regluligum kanningum av svimjihylsvatni til undirvísingarbrúk.

Hvør kanningin kostar í løtuni 130 kr. Mett verður, at ein kanning um mánaðin frá hvørjum svimjihyli er hóskandi, og verður samlaði kostnaðurin sostatt (15 × 12 + 6 × 2) 130 = 24.960 kr. árliga fyri allar svimjihyljarnar — t.v.s. 780 kr. fyri svimjihyljar, ið bert eru í nýtslu 6 mðr. um árið og 1560 kr. fyri svimjihyljar, ið verða nýttir alt árið.

Av tí at uppgávurnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hava verið alsamt vaksandi í seinastuni, kann endalig avtala um regluliga svimjihylskanningar ikki gerast, fyrrenn figgjarlógin fyri 1983/84 er vorðin viðtikin. Tó kunnu vit at byrja við taka einstakar royndir frá hvørjum svimjihyli fyri at kanna, hvussu støðan er.

Sagt verður frá hesum.

Smbrt. skriv frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni dagfest 12. oktober 1982:

Umsókn um játtan: 1. árið 550.000 kr.
2. — 150.000 —
3. — 150.000 —
*til ymiskar kanningar til frama fyri landbúnaðin.*

Í sambandi við, at nógv verður gjørt fyri at stuðla landbúnaðin í Føroyum, skal við hesum verða víst á, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann fara undir regluligar kanningar, treytað av at neyðug játtan fæst til tól, og loyvi verður givið til setan av einum laboranti afturat (fulla tíð).

Talan kann verða um regluligar *kanningar av mjólk* frá leverandørum (% fiti, protein, lactosu og vatn), regluligar *fóðurkanningar* av hoyggi og súrhoyggi (pH, turrevni, fiburinnihald, øskuinnihald, calsium, phosphor v.m.), sum framleitt verður í Føroyum, og *kanningar av jørðprøvum* fyri landbúnaðarmonnum og møguliga fyri urtagarðsmonnum (pH, phosphor, kalium, calsium, magnesium og svávul. Harafturat t.d. jarn, mangan, kopar, zink, bor, molybden, chlorid, natrium, cobolt v.m.).

Ætlanin er aftan á eina ávísa innkoyringartíð at taka eitt ávíst gjald fyri hvørja kanning (t.d. 5-10 kr./mjólkarprøva, 50-100 kr./fóðurprøva og 40-200 kr./jørðprøva), og at kanningarnar sum soleiðis skulu hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Fylgjandi kann stutt verða sagt um hvørt evni sær:

*1. Kanningar av mjólk*
Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger regluliga 2 ferðir um mánaðin bakteriologiskar kanningar og 1 ferð um mánaðin penicillin-restevnis-kanningar av leverandørmjólk.

Leingi hevur verið tosað um, at starvsstovan skuldi fara undir regluligar fitikanningar. Somuleiðis, at starvsstovan skuldi gera kanningar í sambandi við mánaðarligar mjólkareftirlitið (ɔ: Royndarstøðin í Hoyvík), og at fitikanningartólið á Royndarstøðini skuldi yvirtakast/flytast til starvsstovuna (ɔ: Jústines Olsen, Marjun Hanusardóttir Dahl, Páll Vang).

Uppskot hjá okkum er, at starvsstovan keypir eitt »Milko-Scan 104-tól« til kr. 219.335,00 excl. toll og ger allar regluligar kanningar av mjólk, bæði fyri fiti, protein, lactosu- og vatninnihald. Á henda hátt verða allar mjólkarkanningar savnaðar á einum stað.

Upplýsast kann, at m.a. Mjólkarvirki Búnaðarmanna og Suðuroyar Mjólkarvirki hava stóran áhuga fyri, at starvsstovan ger tær regluligu fitikanningarnar, sum nýttar verða til avrokning.

Við hesum kanningum fáa mjólkarvirkini í Føroyum fleiri upplýsingar um leverandørmjólk enn í dag. Landbúnaðurin í Føroyum fær upplýsingar, sum geva honum betri møguleikar fyri at stýra mjólkarframleiðsluni og fóðringini av mjólkneytum. Somuleiðis verður betri fyri at meta um framleiðsluorkuna/góðskuna hjá teim einstøku mjólkneytunum.

*2. Fóðurkanningar*
Starvsstovan kann í dag gera neyðugar kanningar av (strá-)fóður, men trupulleikin er partvíst »fólk« og partvíst, at um fleiri regluligar kanningar skulu gerast, má starvsstovan keypa eitt »fiburanalysu-apparat«, Tecator I til kr. 83.775,00 excl. toll.

Fóðuranalysurnar vildu í fyrsta umfari umfatað: øsku, turrevni, fiburinnihald, org. evni, calsium, phosphor. Hugsað verður, at uml. 120 bøndur kundu verið áhugaðir fyri regluligum kanningum av strá-fóðri/súrhoyggi (uml. 10 analysur um árið pr. bónda), soleiðis at teir til eina og hvørja tíð vistu, hvat fóðurvirðið var í føroyska fóðrinum.

Starvsstovan er før fyri við tí útgerð, hon hevur, at kanna fóður av einumhvørjum slag og m.a. eisini at kanna fóður fyri protein, fiti og fleiri spormineral, um hetta hevur áhuga seinni.

*3. Jørðprøvakanningar*
Starvsstovan er útgjørd við neyðugum tólum í hesum sambandi. Ein ávís innkoyring er neyðug, og sjálvsagt er størsti trupulleikin í

hesum føri eisini »fólk«.

Hugsað verður, at búnaðarmenn (og urtagarðsmenn) vilja nýta møguleikan at fáa jørðina hjá sær kannaða fyri á tann hátt at fáa nýtt eina so góða fóðring sum gjørligt og á tann hátt fáa sum mest burtur-úr. Í øðrum londum er tað heilt náttúrligt at fáa jørðina kannaða, men hesin møgulciki hevur ikki verið í Føroyum enn.

Í fyrsta umfari verður hugsað um, at kanningarnar skulu umfata pH, phosphor, kalium, calcium (ɔ: møguleiki at nýta knústar jákups-skeljar sum tæðingarevni), magnesium og svávul. Seinni kunnu meira umfatandi kanningar gerast sum t.d. jarn, mangan, kopar, zink, bor, molybden, chlorid, natrium, cobolt v.m.

Somuleiðis verður her hugsað um, at eini 120 búnaðarmenn hava áhuga fyri í meðal at gera 10 kanningar um árið.

*Samandráttur*

Víst verður til *hjáløgdu kostnaðarætlan,* sum vísir, at 1. árið skulu nýtast 550.000 kr. og eftirfylgjandi árini uml. 150.000 kr./ár. *Hjálagda inntøkuætlan* vísir, at stórur møguleiki er fyri, at kanningarnar koma at hvíla í sær sjálvum fíggjarliga, og at tær óivað koma at geva starvsstovuni eykainntøku.

Ynskiligt er, at landsstýrið saman við fíggjarnevnd løgtingsins tekur støðu til, um landbúnaðurin sum so skal hava møguleika at fáa gjørt tær kanningar, sum nevndar eru frammanfyri, og at starvs-stovan við tí útgerð og kunnleika, hon hevur, fær tær neyðugu játtanirnar til at seta hesa ætlan í verk.

Vónandi fær málið eina góða viðgerð, og kunnu vit um neyðugt koma á fund við landsstýrið ella fíggjarnevnd løgtingsins fyri at greiða nærri frá.

**A. Kostnaðarætlan**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *1. árið:* | | | |
| 1 laborant ..... | | | 125.000 kr. |
| Kemikaliir incl. toll ..... | | | 25.000 — |
| Milko-Scan 104: | 219.335 kr. | | |
| Tecator I: | 83.775 — | | |
| Ristingartól: | 20.000 — | 323.110 kr. | |
| Tollur 25% ..... | | 80.800 kr. | 403.910 — |
| | | **uml.** | **550.000 kr.** |

*2. árið og eftirfylgjandi ár:*

| | |
|---|---|
| 1 laborant ..... | 125.000 kr. |
| Kemikaliir incl. toll ..... | 25.000 — |
| **Tilsamans** | **150.000 kr.** |

**B. Inntøkuætlan**

*1. mjólk:*

| | |
|---|---|
| 120 × 2 × 12 × (5-10 kr.) = | 14.400-28.800 kr. |

*2. Fóðuranalysur:*

| | |
|---|---|
| 120 × 10 × (50-100 kr.) = | 60.000-120.000 — |

*3. Jørðprøvaanalysur:*

| | |
|---|---|
| 120 × 10 × (50-100 kr.) = | 60.000-120.000 — |
| **Tilsamans** | **134.400-268.800 kr.** |

---

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
1 kemikari ikki játtaður aftrat.
1 eftirlitsmaður ikki játtaður aftrat.
1/2 laborantur játtaður.

Játtað er á konto 253306 Amboð til mjólkakannингar:

| | |
|---|---|
| Milko-Scan 104: ..... | 219.335 kr. |
| Tecator 1: ..... | 83.775 kr. |
| Ristingartól ..... | 20.000 kr. |
| | 323.110 kr. |
| + 20% toll ..... | 80.800 kr. |
| **Tilsamans** | **403.910 kr.** |

**Ad § 15-15907/323012: Bókadeild Føroya Lærarafelags (Barna- og ungdómsblaðið)**

Sbrt. skriv dagf. 28. september 1982:

Vísandi til landsstýrisskriv frá 16. aug. 82 — J.F.L. nr. 400 - 34[61] — fari eg vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags at søkja um studning til Barna- & Ungdómsblaðið

kr. 50.000,-

Hetta tal er størri enn tað, vit higartil hava søkt um, og kemst tað av, at Barna- & ungdómsblaðið í fjør hevði eitt undirskot stórt 93.000 kr. Vit rokna við at minka eitt sindur um hallið komandi ár við øktum haldaratali.

Annars halda vit tað hava allarstørstan týdning, at børn og ungdómur okkara kann fáa lesitilfar á føroyskum, og vóna vit tí, at tað fer at bera til at játta nevnda pening.

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot 1983/84 |
|---|---|---|---|
| §15 2390 3201 Barna- & ungdómsblaðið | 10.000 | 10.000 | 50.000 |

**Ad § 15-15907/323012: Barnatíðindi**

Sbrt. skriv dagf. 1. okt. 1982:

Rakstrarroknskapur
fyri »Barnatíðindi« árið 1981

Inntøkur:

| | | |
|---|---|---|
| Lýsingar, blaðhald, søla ..... | Kr. | 8.030 |
| Løgtingsstudningur ..... | — | 5.000 |
| | **Kr.** | **13.030** |

Útreiðslur:

| | | |
|---|---|---|
| Prenting, tilfarsrit o.a. ..... | Kr. | 3.850 |
| Postgjald, box ..... | — | 950 |

| | | |
|---|---|---|
| Telefon ..... | — | 920 |
| Ljós, hiti, reingering ..... | — | 2.000 |
| Annað ..... | — | 250 |
| Samsýning ..... | — | 5.060 |
| | | **Kr. 13.030** |

Ókeypiseintøk verða send teimum lýsandi
— — — skúlabørnum.
— — — sjúkrahúsum.
Haldarar: 200, ársgjald: kr. 20,-

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**

| | |
|---|---|
| Játtaðar verða til Barnatíðindi ..... | 10.000 kr. |
| og til Barna- og ungdómsblaðið ..... | 20.000 — |
| **tilsamans** | **30.000 kr.** |

**Ad § 15-15907/323037: Sjónleikur v.m.**

Sbrt. skriv frá Meginfelag áhugaleikara Føroya dagf. 21. okt. 1982:

Meginfelag áhugaleikara Føroya takkar fyri játtaðan stuðul í hesum fíggjarári og loyvir sær við hesum at søkja um kr. 150.000,- úr landskassanum fyri fíggjarárið 1983/84 smbrt. fíggjarætlan felagsins fyri 1983, sum er løgd við her saman við grannskoðaða roknskapinum fyri 1981.

Orsøkin til, at roknskapin fyri 1981 visir upp á sig stórt rakstraravlop er, at tað var liðið so langt út á árið, tá studningur var tøkur, og tíðskil var skeið irksemið hjá felagnum lagt fyrst í 1982.

Felagið veitir limafeløgum og øðrum áhugaðum ráð og leiðbeiningar, eins og fíggjarligur stuðul verður latin ungfólki serliga, ið hug hevur at leita sær útbúgving og kunnleika um leiklist, tá høvi býðst.

Skipað verður fyri fundum og skeiðum. — Roynt verður eisini at birta lív í aftur sjónleikarfeløg, sum ikki hava verið virkin seinastu árini. Onnur feløg — ungmannafeløg, bygdafeløg o.s.fr. — sum eisini

fáast við sjónleik, eru væl komin sum limir.

Við vón um vælvild og góða undirtøku sendir felagið inn hesa umsókn um studning fyri 1983/84 upp á kr. 150.000,-.

*Ad. 2* Stuðul til gestalærara.

*Ad. 3* Søkt verður um kr. 150.000,- í stuðul. — Umleið tað sama sum árið frammanundan.

*Ad. 4* Her uppií er gáva frá Føroya Sparikassa kr. 20.000,- og kr. 30.000,- av uppspardum eginpeningi.

*Ad. 5* Í felagsviðtøkunum krevst, at umsitingarstjóri skal hava um hendi dagligu leiðslu felagsins.

*Ad. 6* MáF letur stuðul til einstøku leikfeløgini og til einstaklingar, ið leita burtur at fáa sær útbúgving innan leiklist, og sum kunnu søkja um stuðul frá MáF. Higartil í 1982 hava kr. 5.400,- verið latnar 7 fólkum. — MáF hevur somuleiðis veitt 3 limafeløgum beinleiðis stuðul við kr. 18.900,- til leikuppsetan.

Ad. 7 Ætlanin er at halda skeið fyri fólki, sum her á landi fáast við leikuppsetan. Luttakarar rinda sjálvi ein part.

Ad. 8 Avgjørt er at halda norðurlendskt ungdómsskeið í Norðurlandahúsinum í tíðini 31. juli til 7. august 1983 við eini kostnaðarætlan upp á kr. 179.000,-, sum verður fíggjað við stuðli sum omanfyri greitt frá og annars yvir rakstur felagsins.

*Ad 9* Her uppií er útreiðsla til aðalfundin í NAR, sum verður í Íslandi í 1983.

*Ad 10* Við tí vaksandi áhuga fyri sjónleiki verður bráðneyðugt at fáa til vega hóskandi leikrit. — Meginfelagið verður at stíla fyri leikritakapping.

**Fíggjarætlan fyri 1983 hjá Meginfelag áhugaleikara Føroya**

Inntøkur:

| | |
|---|---|
| 1. Limagjald ..... | 2.800 kr. |
| 2. Stuðul frá N.A.R. ..... | 5.000 — |
| 3 Landskassastuðul ..... | 150.000 — |
| 4. Aðrar inntøkur ..... | 51.000 — |
| | **208.800 kr.** |

Útreiðslur:

| | | |
|---|---|---|
| 5. Lønir | | 65.000 kr. |
| 6. Stuðul til leikfeløg og einstaklingar | | 40.000 — |
| 7. Skeiðvirksemi hjá MáF | | 20.000 — |
| 8. Norðurlendska ungdómsskeiðið í 1983 | 179.000,- | |
| ÷ NAR stuðul | 30.000,- | |
| ÷ Jólamerkjagr. | 50.000,- | |
| ÷ stuðul til gestalærara | 5.000,- | |
| ÷ luttakaragjald | 54.000,- | |
| Nettoútreiðsla | | 40.000,- |
| 9. Fundarútreiðslur | | 15.000,- |
| 10. Útvegan av leikritum | | 12.000,- |
| 11. Skrivstovuhald | | 6.000,- |
| 12. Telefon, porto, lýsingar | | 6.000,- |
| 13. Ymist | | 4.800,- |
| | | **208.800,- kr.** |

**Að § 15-15907/323053: Útgáva av barnabókum**

Stmbrt. skriv dagfest 28 septembur 1982.

Vísandi til skriv tykkara dagsett 6. aug. 8[illegible] - F.I.j.nr. 490-34[68] — fari eg vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur gjørt av at leggja stuðlingin at gevast at barna- og ungdómsbókum fyri

kr. 450.000,

Hetta tal er nakað størri enn í ár, tí vanligt hava vit søkt um - tó burtursæð frá í fjor, tá vit hava fingið 25 ára jubilæum

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur gjørt av at leggja størri dent á at útgeva ungdómsbøkur komandi árini. Hetta fer at krevja størri fløgur, og tí hava vit hækkað umsókn okkara.

Vón okkara er, at tað fer at bera til at ganga umsóknini á møti.

| Konto: 15907/323053 | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins í 1000 kr. | Ætlan 1984/85 í 1000 kr | Ætlan 1985/86 í 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útgáva av barnabókum ..... | 350.000 | 500.000 | 450.000 | 450.000 | 450,0 | 450,0 |

## Ad § 15-15907/323116: Skúlabókaútgáva

Smbrt. skriv dagfest 29. september 1982:

Fyri Føroya Skúlabókagrunn skal eg, eftir at nevndin hevur kannað um tær útreiðslur, ið væntandi koma at verða fíggjarárið 1983/84, heita á landsstýrið um at seta á fíggjarløgtingslógina sum studningsveitan *kr. 900.000,-*

Hjálagt verður sent landsstýrinum:

1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1983/84.
2. Skjal I.
3. Skjal II.
4. Yvirlit yvir ætlan fyri 1984/85 og 1985/86.
5. Roknskapur fyri 1981/82 (og viðm.).
6. Yvirlit yvir grunsins bøkur á goymslu hjá BMS 1. apr. 1982.
7. Yvirlit yvir útkomnar bøkur 1. okt. 1981 - 30. sept. 1982.
8. Yvirlit yvir handrit, ið arbeitt verður við.

*1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1983/84.*

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Til bókaútgávu ..... | 950.000,- — |
| 2. | Renta av kassakreditti ..... | 27.000,- — |
| 3. | Leiga av høli ..... | 15.000,- — |
| 4. | Innbúgv (bókakeyp, skrivstovuumboð v.m.) ... | 19.000,- — |
| 5. | Ljós, telefon, porto, lýsingar v.m..... | 14.000,- — |
| 6. | Vikarsamsýningar ..... | 30.000,- — |
| 7. | Løn til skrivstovufólk og aðrar skrivstovuútreiðslur | 195.000,- — |
| 8. | Niðurskurður av millumrokning við landskassan | 200.000,- — |
| | | 1.450.000,- kr. |
| | ætlaður søluupphingur 1983/84 ..... | 550.000,- — |
| | | 900.000,- kr. |

ad. 1 Í 1982/83 vórðu játtaðar 700.000,- kr., 100.000,- kr. minni, enn søkt varð um. Orsakað av hesum og havandi í huga tær fíggjarliga krevjandi útgávur, sum grunnurin er farin undir, heldur nevndin tað vera rímiligt at søkja um 900.000,- kr. Útgávurnar, sum serliga verður hugsað um, eru:

Lesibók til 2. skúlaár
Lesibók til 3. skúlár, 1. p.
Gud kallar teg
Tjóðskaparrørslutíðin
Føroyskar bókmentir í úrvali 3
Vejen til førerkortet (umseting og tillaging)
Føroyskar bókmentir í úrvali 4

ad 6. Í ávísum førum verður neyðugt at gjalda løn til vikar fyri at geva lærarum stundir at avgreiða handrit endaligt. Hetta gjald verður so roknað sum partur av samsýning fyri bókina.

ad 7. Her verður hugsað um leyst tímalønt hjálparfólk, tá ið á stendur at fáa greitt ymiskar uppgávur viðv. handritum og skrivstovuarbeiði.

| Føroya Skúlabókagrunnur | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr | Ætlan 1985/86 í 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|
| | 700.000 | 900.000 | 800.000 | 800,0 | 800.0 |

*4. Yvirlit yvir ætlan fyri 1984/85 og 1985/86*

Fyri árini 1984/85 og 1985/86 er studningsumsóknin fyri árið 1983/84 framskrivað við 12 1/2% p.a. (sí skjal I).

Umframt tær undir ad 1 í yvirliti yvir væntandi útreiðslur 1983/84 nevndu bøkur kann upplýsast her, at grunnurin hevur havt fyrispurningar um aðrar kostnaðarmiklar útgávur, sum á natúrligan hátt koma undir grunsins virksemi, t.d. eina Føroya søgu í fýra bindum.

Hesi framskrivaðu tøl mugu sostatt takast við fyrivarni.

**Viðmerking frá landsstýrinum**
Roknskapurin er til skjals á Landsskrivstovuni

---

**Ad § 15-15907/323165: Rakstur av Bókamiðsøluni**

Smbrt. skriv dagfest 30. september 1982.

Sum árini frammanundan loyvir Bókamiðsølan sær aftur í ár at heita á Landsstýrið um at veita okkum stuðul til raksturin av miðsøluni fyri roknskaparárið 1983/1984.

Bókamiðsølan hevði í rakstrarárinum 1981/82 eitt hall stórt kr. 25.000,00 og kemur ætlandi í inniverandi ári at hava eitt hall stórt kr. 65.000,00.

Studningurin hjá Landskassanum er ikki hækkaður síðani 1978, meðan tær føstu útreiðslurnar hjá Bókamiðsøluni í sama tíðarskeiði eru munandi hækkaðar. Nevnast kann eisini, at starvsøkið hetta tíðarskeiðið er víðkað, við tað at Bókamiðsølan nú eisini avgreiðir ókeypis ymiskt, sum Landsskúlafyrisitingin sendir út til skúlarnar.

Vit loyva okkum tí at skjóta upp, at studningurin frá landskassanum verður hækkaður til

*kr. 300.000,00*

Hjálagt skriv, sum vísir, hvussu vit koma fram til hetta tal.

| | Konto 15907/323165: | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot Stovnsins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innt. | Sølugjald 10% ..... | 81.833,71 | 80.000,00 | 82.000,00 | 80,0 | 85,0 |
| | Studningur úr landskassanum . | 220.000,00 | 220.000,00 | 300.000,00 | 350,0 | 390,0 |
| | Renta av innistandandi ..... | 10.951,45 | 10.000,00 | 10.000,00 | 10,0 | 10,0 |
| Útr. | Lønir ..... | 154.596,45 | 162.696,45 | 170.796,45 | | |
| | Húsaleiga ..... | 108.585,90 | 120.634,00 | 130.000,00 | 192,1 | 216,1 |
| | Skrivstovuútreiðslur ..... | 12.924,90 | 14.540,50 | 16.358,00 | 160,0 | 180,0 |
| | Príslistar ..... | 9.495,00 | 7.000,00 | 7.000,00 | 18,4 | 20,7 |
| | Koyring, farmagjald, postgjald | 10.183,55 | 11.456,50 | 12.888,55 | 8,0 | 8,0 |
| | Trygging ..... | 10.010,00 | 10.010,00 | 13.000,00 | 14,5 | 16,3 |
| | Revisión ..... | 10.100,00 | 10.100,00 | 10.100,00 | 13,0 | 13,0 |
| | Telefon ..... | 1.503,00 | 1.878,00 | 2.348,00 | 10,5 | 10,5 |
| | Húsaútreiðslur, vask o.a..... | 10.132,23 | 12.665,20 | 15.831,50 | 2,6 | 2,9 |
| | Ymiskt ..... | 2.753,50 | 3.441,80 | 4.302,30 | 16,0 | 17,0 |
| | Sølustevna í Vági og í Havn ... | 0,00 | 14.000,00 | 0,00 | 3,0 | 4,0 |
| | Rakstraravlop áðrenn avskriving | ÷ 17.499,37 | ÷ 58.409,45 | + 9.375,20 | + 2,1 | ÷ 3,6 |
| | Avskrivað uppá innbúgv ..... | 8.000,00 | 7.000,00 | 6.000,00 | 6,0 | 5,0 |
| | Ársúrslit ..... | ÷ 25.499,37 | ÷ 65.409,45 | + 3.375,20 | ÷ 4,2 | ÷ 8,6 |

Tølini fyri 1984/85 og 1985/86 eru mett út frá uppskotinum 1983/84, flestu postar eru hækkaðar við 12,5% um árið.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum**
Játtað 250.000,- kr.

**Ad § 15-15907/323173: Orðabóka útgáva í grunn:**

Smbrt. skriv dagfest 11. oktober 1982:

*Umsókn um játtan á fíggjarløgtingslógini 1983/84*
Føroya Fróðskaparfelag loyvir sær við hesum at søkja um eina upphædd á fíggjarløgtingslógini 1983/84 upp á *kr. 92.000,00* í grunnin til útgávu av orðabókum (grunnur nr. 6625).

Á fíggjarløgtingslógini 1980/81 vórðu játtaðar kr. 88.000 til orðabókaútgávu, harav kr. 80.000 fóru til at afturrinda eitt lán frá 1978 til útgávu av Donsku-føroysku og Føroysku-donsku orðabókini, samstundis sum kr. 8.000 kundu fara í landskassagrunnin, sum onga játtan hevði fingið síðan 1974/75. Á fíggjarløgtingslógini 1981/82 vórðu játtaðar kr. 75.000 í grunnin og sama upphædd á fíggjarløgtingslógini 1982/83.

Hesin grunnur, sum hevur verið til síðan 1959/60, er ætlaður til fígging av *útgávukostnaði* av orðabókum, men ikki til handritaarbeiði og prenting, og hann hevur í royndum verið høvuðsálitið, hóast peningastovnarnir, sergrunnar og privatar fyritøkur hava verið sera lagalig at veita stuðul til útgávu av teimum orðabókum og orðalistum, sum felagið hevur givið út.

Orðabókasamstarvið millum landsstýrið og Fróðskaparfelagið gongur aftur til 1958/59, tá ið landsstýrið beyð sær til at útvega pening til handritagerð og prenting av nýútgávu av Føroysku-donsku orðabókini, bæði við at útvega munandi stuðul frá føroyskum peninga- og handilsstovnum og við at seta pening av á fíggjarlógini.

Treytin fyri hesum studningi var, at allur avlopspeningur frá søluni av orðabókum og orðalistum, sum felagið gav út, skuldi fara óskerdur í ein grunn, sum ber heitið Orðabókagrunnurin (stovnaður 1959). Sambært fundatsinum kann peningur úr hesum grunni bert nýtast til *handritagerð*, men ikki prenting av orðabókum.

Hesi seinastu árini hevur peningur úr hesum grunni verið nýttur til handritaarbeiði við 3 orðabókum: enskari-føroyskari, føroyskari-enskari og føroyskari-norskari orðabók. Enska-føroyska orðabókin er so gott sum liðug at fara til prentingar, og hon verður við núgaldandi prísum mett at fara at kosta ikki minni enn 200.000 kr.

Harumframt er at siga, at tað er bráðneyðugt at fyrireika nýútgávu av Føroysku-donsku og Donsku-føroysku orðabókini. Tær vórðu endurprentaðar (fotoprentaðar) í 1977 í 5.000 eintøkum, og prentútreiðslurnar tá lógu nakað oman fyri 250.000 kr. Bøkurnar komu í

handlarnar í 1978, og sum sølan hevur verið síðan tá, verða bøkurnar uppseldar um eini 2 ár.

Tað er tí altumráðandi at fáa munandi fíggjarlógarjáttan í landskassagrunnin til útgávu av orðabókum, skal nøkur vón vera um at fáa orðabøkurnar út sum ætlað.

---

**Ad § 15-15907/323228: Mentunargrunnurin**

Smbrt. skriv dagfest 30. september 1982.

Vísandi á skriv landsstýrisins frá 16. august 1982 - F.I..j.nr. 400-34[70] um uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84 — rakstrarstað 15907/323228, mælir stýrið fyri Mentunargrunninum til, at sett verður á fíggjarløgtingslógina:

| | |
|---|---|
| Mentunargrunnurin, studningur ..... | kr. 200.000,- |
| Láuigrunnur til bókaútgávu ..... | — 100.000,- |

Hetta eru somu játtanir sum á verandi løgtingsfíggjarlóg. Tað er at viðmerkja, at Mentunargrunnurin í ávísum føri hevur staðið fyri útgávu av verkum, sum mett eru av týdningi at geva út og annars ikki komu út.

Grunnurin rindar útgávuna av Fróðskaparriti. Í 1983 kostaði útgávan útivið kr. 100.000,- nakað av inntøku er tó av sølu av ritinum. Tó skal nevnast, at útgávan hesaferð var rúgvumiklari enn vanligt.

Grunnurin loyvir sær at vísa á, at ein partur av umsóknunum er til útgávu av barnabókum. Grunnurin heldur tað vera rætt eisini at koma tílíkum umsóknum á møti, hóast kr. 350.000,- eru játtaðar beinleiðis til útgávu av barnabókum, sum verða umsitnar beinleiðis av Lærarafelagnum.

Tað eru fleiri, sum av ymsum orsøkum ikki vilja geva út gjøgnum Lærarafelagið.

Stýrið hevur ikki hildið seg kunnað seta av pening til stovnsfæ grunsins í hesum og seinasta fíggjarári, krøvini til grunnin og umsóknirnar hava verið vaksandi — og so var heldur eingin játtan á løgtingsfíggjarlógini 1981/82.

Viðvíkjandi fíggjarætlan fyri 1984/85 og 1985/86 metir stýrið ikki, at játtanin eigur at verða lakari enn í 1981/82, nevniliga kr. 200.000,-

til Mentunargrunnin og kr. 100.000,- til Lánigrunnin til bókaútgávu, um tað skal verða gjørligt at røkka til tað, sum er av øktum umsóknum.

At enda skal stýrið mæla til, at viðmerking kemur aftur til fíggjarløgtingslógina, hvussu stórur partur av studninginum til Mentunargrunnin skal leggjast til stovnsfæið árliga. Stýrið skjýtur upp, at henda ílegging verður kr. 50.000,-.

---

**Ad § 15-15907/323236: Føroya Listasavn**

Sbrt. skriv dagf. 29. september 1982:

*Viðvíkjandi fíggjarlógini 1983/84*

Rakstrarstað Føroya Listasavn v.m.

Ein partur av hesi veiting fer til rakstur Listaskálans.

Veitingin 1982/83 var 130.000 kr.

Biðið verður um, at veitingin 1983/84 verður tann sama við 12 1/2% hækkan: *146.250 kr.*

Ætlanirnar fyri 1984/85 og 1985/86 verða á somu hædd.

Virksemi Listaskálans verður lagað eftir teimum inntøkum og veitingum, ið eru, og meta vit, at aktiviteturin innan- og uttanlands hevur verið rímiligur.

Hetta hálvárið hevur einki framsýningarvirksemi verið, í staðin verður skálin umbygdur. Til tess at tryggja okkum møguleika at fáa húsið í besta stand aftur er neyvan ráðiligt at minka um núverandi játtan.

Virksemið verður óivað øðrvísi, tá ið Norðurlanda Húsið er komið at virka — á tann hátt, at skálin verður meira eitt tjóðlistasavn (nationalgallarí), meðan tað livandi virksemi við skiftandi framsýningum verður meira í Norðurlanda Húsinum. Henda broyting fer at vísa seg komandi 3-áraskeiðið, men komandi ár hava vit mangar stórar ætlanir at seta í verk.

Ein møgulig frígering av peningi orsakað av minni aktiviteti í hesi 3 áratíð eigur umframt at verða nýttur til liðugtgerð eisini at verða nýttur til at umvæla sjálvt myndasavnið, skifta út rammur og umvæla ymiskt slit, ið komið er á myndirnar øll hesi árini, listasavnið hevur virkað.

---

Tann broyting átti at verið gjørd í lóggávugrundarlagnum, at Listaskálin og Føroya Listasavn vórðu ein stovnur — við einari nevnd, ið hevði rímiligari stødd enn núverandi listasavnsnevnd og tí var meira effektiv. Játtanin á fíggjarlógini hevði tá kunnað verið býtt millum húsarakstur og myndakeyp á skilabetri hátt, og lættari hevði verið at prioriterað eftir tørvi.

Um enn peningur varð ikki beinleiðis spardur, fekst óivað meira burtur úr honum tá.

Lógargrundarlag listasavnsins skuldi so verið broytt, soleiðis at heimild var at keypa inn list, ið beinleiðis var ætlað at nýta til eina rættiliga kvalitetsframsýning, ið skuldi at kalla verið permanent í útlandinum, ferðast landanna millum og verið ein betri umboðan enn tær framsýningar, vit royna at læna okkum fram til og skava saman í hvørjum einstøkum føri. Sjálvsagt skuldi hendan framsýning verið kompletterað við føstum millumbilum.

*Sbrt. skriv dagf. 14. okt. 1982 frá Føroya Listasavni:*
Listasavnið skal við hesum takka landsstýrinum hjartaliga fyri ta stóru vælvild, ið sýnd varð Føroya Listasavni og Listaskálanum við játtanini á fíggjarløgtingslógini 1982/83.

Samstundis skal Listasavnið søkja Føroya Landsstýri um, at stuðulin til Listasavnið verður hækkaður frá 50.000 til 100.000 kr. fyri árið 1983/84.

Eisini skal verða mælt til, at landsstýrið vísir teimum ætlanum, ið nevndar hava verið viðvíkjandi viðkan av Listaskalanum, neyðuga vælvild, so at rúm kann fáast til vega í Skálanum til bestu listaverkini í einum høli fyri seg sum føst framsýning, ið altíð hongur uppi, meðan onnur høli verða til taks at nýta til aðrar, skiftandi framsýningar.

Víst verður annars til grundgevingarnar, ið førdar vóru fram í skrivinum frá Listasavninum til Føroya Landsstýri dagfest 29.9.1981.

Hjálagdur verður roknskapur fyri part av 1982. x)

---

x) Roknskapurin til skjals á Landsskrivstovuni.

**Viðmerking frá landsskrivstovuni:**

| | |
|---|---|
| Játtaðar verða til listaskálan ..... | 150.000 kr. |
| og til listasavnið ..... | 50.000 — |
| | **200.000 kr.** |

**Ad § 16-16018 Vrakarastovnurin**

Sbrt. skriv dagf. 18. nov. 1982:

Vísandi til skriv landsstýrisins dagfest 16. august 1982 (F.L.j.nr. 400-34-72) verður hjálagt sent uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1983/84 fyri *Vrakarastovnin.*

Roknskapartølini fyri 1981/82 og játtanin fyri 1982/83 eru eisini uppsett til sammetingar.

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Vrakarastovnurin - 16018* | | | | | | | |
| 103048 | Tænastumenn ..... | 1.186.758 | 1.260.000 | [1] 1.460.000 | 1.340.000 | 1.340 | 1.340[2] |
| 103151 | Avloysarar ..... | 120.500 | 98.000 | 127.000 | 127.000 | 127 | 127 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 157.810 | 140.000 | 165.000 | 165.000 | 165 | 165 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 21.000 | 35.000 | 40.000 | 40.000 | 40 | 40 |
| 233259 | Postgjald ..... | 1.447 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3 | 3 |
| 233354 | Telefon v.m..... | 24.378 | 30.000 | 35.000 | 35.000 | 35 | 35 |
| 233561 | Aðrar útreiðslur ..... | 13.180 | | — | — | — | — |
| | a) Elektronisk mátitól | | 55.000 | 60.000 | 60.000 | 60 | 60 |
| | b) Skeiðvirksemi .... | | 45.000 | 80.000 | 30.000 | 30 | 30 |
| | c) Bilurin ..... | | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20 | 20 |
| | | **1.525.073** | **1.686.000** | **1.990.000** | **1.820.000** | **1.820** | **1.820** |

[1] 1 yvirvrakari
8 vrakieftirlitsmenn

**Viðm.**
Mælt verður til at seta 1 vrakieftirlitsmann í Sandoynni, nú 2 virki eru har, og er hansara løn, uml. kr. 120.000,00, rokniað við her.

2) 1 yvirvrakari
9 vrakieftirlitsmenn, incl. 1 í Sandoy.

**Viðm.**
Yvirvrakarin og vrakieftirlitsmenninir eru undirløntir, og mælt verður til at hækka lønirnar við 15/20%.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
1 vrakieftirlitsmaður í Sandoynni, 120.000 kr., ikki játtaður.

**Ad § 16 - 16106 Nautiskt Royndarkamar**

Sbrt. skriv dagfest 5. oktober 1982

---

| Heiti | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Samsýning ..... | kr. 6.600,00 | 6.600,00 | 6.600,00 | 6.600 | 6,6 | 6,6 |
| Rakstrarútreiðslur ..... | kr. 4.940,15 | 5.000,00 | 6.000,00 | 6.400 | 6,4 | 6,4 |
| Viðlíkahald av reiðskapi ..... | kr. 1.017,25 | 25.000,00 | 5.000,00 | 5.000 | 5,0 | 5,0 |
| 8 prógvgjald ..... | kr. 2.360,00 | 1.200,00 | 1.000,00 | 1.000 | 1,0 | 1,0 |
| **Tilsamans** | **kr. 10.197,40** | **35.400,00** | **16.600,00** | **17.000** | **17,0** | **17,0** |

**Ad § 16 - 16208/373106 Sjómansheim**

Sbrt. skriv dagf. 20. august 1982:
Bygginevndin fyri føroyska sjómansheimið í Reykjavík leggur inn umsókn til háttvirda landsstýrið um peningastuðul í fíggjarárinum 1983/84 til byggingarframhald av sjómansheiminum.

Bygginevndin takkar fyri munandi veitan at stuðuli undanfarin ár og vónar, at landsstýrið framvegis fíggjarliga er før fyr at stuðla okkum.

Nú vinna vit við at fáa innlagt heitt vatn, ravmagn og telefoninnlegging, fyri at hetta kann gerast, krevst fyrst frágongd av 1/3 av grundstykkinum, framat hesum kemur eingin sjálvboðað vinna.

---

Sbrt. skriv dagf. 16. september 1982:

.....um stuðul til sjómansheimið í fíggjarárinum 1983/84 lovaði eg at senda bræv seinni við upplýsingum.

Glasið er komið í 2 ovaru hæddirnar, húsið kustað við sementi og málað á uttan, einki glas er komið í gøtuhæddina, gjørt heilt við timbri og plastikki. Tað, vit nú royna at fáa gjørt, er at klára íbúðina, fáa inn ravmagn og heitt vatn. Vit hava bundið tilboð, ovnar við festingum í alt húsið leverað á staðnum kr. 115.000, borgað kr. 35.000. Heitavatns inntakið kostar kr. 60.000, ravmagnsinntakið kr. 28.000, hetta eru stór tøl, men tað eru ísl. kr.

Vit vóna at klára íbúðina til í vár komandi. Húsið er nú komið so langt, at tað má sum skjótast búgva í húsinum fyri at fyribyrgja vandan fyri skemdarverki, sum tíverri fyrikoma alt ov ofta víða hvar.

Tað er ikki meir at siga frá beint nú, hetta er bert fyri at kunna fylgjast eitt sindur við, hvussu gongur, eg leggi tvær myndir av húsinum, sum tað sær út nú, til hjálpar at lýsa hetta nakað betur. Húsið er í 3 hæddum, gólvvíddin samtals 1267 $m^2$.

Takka hjartaliga fyri veittan stuðul.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**

| | |
|---|---|
| Til sjómansheim í Reykjavík játtað ..... | 40.000 kr. |
| — Hina føroysku sjómansmissiónina ..... | 90.000 — |
| og til Kirkjuliga missiónsfelagið ..... | 10.000 — |
| **Tilsamans** | **140.000 kr.** |

**Ad § 16 - 16301 Vaktar- og Bjargingartænastan**

Smbrt. skriv dagfest 27. september 1982:

**Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1983/84**

| | | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarstað 16301: Skrivstovan ..... | kr. | 6.520,- | 6.520 | 6.520 | 6.520 |
| Rakstrarstað 16315: »Tjaldrið« ..... | kr. | 7.689.876,- | 7.419.876 | 7.419.876 | 7.419.876 |
| Rakstrarstað 16334: »Ólavur Halgi« .... | kr. | 7.111.880,- | 6.841.880 | 6.841.880 | 6.841.880 |
| | **kr.** | **14.808.276,-** | **14.268.276** | **14.268.276** | **14.268.276** |

## Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1983/84
## Rakstrarstað 16301: Skrivstovan

| Kontonr. | navn | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | ÷ 1.500.000,00 | ÷ 1.600.000,- | ÷ 1.700.000,- | ÷ 1.700.000 | ÷ 1.700,0 | ÷ 1.700,0 |
| 83945 | Søla av sjókortum | ÷ 14.817,50 | | | | | |
| 103048 | Løn - tænastumenn | 239.734,82 | 252.000,- | 262.450,- | 262.450 | 262.5 | 262,5 |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 176.274,00 | 180.000,- | 186.570,- | 186.570 | 186,6 | 186,6 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur innanl. | | | 2.000,- | 2.000 | 2,0 | 2,0 |
| 113243 | Ferða- og dagpeningur uttanl. | | | 10.000,- | 10.000 | 10,0 | 10,0 |
| 123103 | Skeið | 8.832,80 | 10.000,- | 20.000,- | 20.000 | 20,0 | 20,0 |
| 203212 | Prenting av sjókortum | 5.261,18 | | | | | |
| 213105 | El - hiti - vask | 39.003,70 | 40.000,- | 45.000,- | 45.000 | 45,0 | 45,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 59.630,00 | 80.000,- | 88.000,- | 88.000 | 88,0 | 88,0 |
| 233051 | Innbúgv | 7.930,00 | 10.000,- | 5.000,- | 5.000 | 5,0 | 5,0 |
| 233155 | Prenthutir | 1.299,00 | 3.000,- | 2.500,- | 2.500 | 2,5 | 2,5 |
| 233354 | Telefon og telex | 67.419,04 | 80.000,- | 85.000,- | 85.000 | 85,0 | 85,0 |
| 253339 | Leiga av førum | 459.790,19 | 500.000,- | 500.000,- | 500.00 | 500,0 | 500,0 |
| 253873 | Helikoptarasløkkiútgerð | | 120.500,- | 50.000,- | 50.000 | 50,0 | 50,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 24.338,39 | 30.000,- | 30.000,- | 30.000 | 30,0 | 30,0 |
| 253969 | Aldumátarar | 133.417,49 | 125.000,- | 250.000,- | 250.000 | 250,0 | 250,0 |
| 253985 | Bjargingarfeløg | 100.000,00 | 108.000,- | 135.000,- | 135.000 | 135,0 | 135,0 |
| 333153 | Veðurprogramm | 29.945,50 | 35.000,- | 35.000,- | 35.000 | 35.0 | 35,0 |
| | | **+ 161.941,39** | **+ 26.500,-** | **6.520,-** | **6.520** | **6,5** | **6,5** |

**Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1983/84**
**Rakstrarstað 16315: »Tjaldrið«**

| Kontonr./navn | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 í 1000 kr. | Ætlan 1985/86 í 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur ..... | 363.385,00 | | | | | |
| 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 2.813.888,24 | 3.120.000,- | 3.364.876,- | 3.364.876 | 3.364,9 | 3.364,9 |
| 103151 | Løn - avloysarar ..... | 355.921,26 | 50.000,- | 80.000,- | 80.000 | 80,0 | 80,0 |
| 103405 | Úrtíðarløn ..... | 10.683,42 | 25.000,- | 20.000,- | 20.000 | 20,0 | 20,0 |
| 123103 | Skeið ..... | 0,00 | 20.000,- | 30.000,- | 30.000 | 30,0 | 30,0 |
| 213702 | Ognar- og vanlukkutrygg . | 335.417,00 | 315.000,- | 315.000,- | 315.000 | 315,0 | 315,0 |
| 253107 | Kostur - búnyttur - vask .. | 178.151,42 | 255.000,- | 285.000,- | 285.000 | 285,0 | 285,0 |
| 253306 | Nav. amboð ..... | 105.618,84 | 65.000,- | 100.000,- | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| 253418 | Olja ..... | 2.123.661,08 | 2.200.000,- | 2.475.000,- | 2.475.000 | 2.475,0 | 2.475,0 |
| 253426 | Deksútgerð ..... | 112.295,29 | 100.000,- | 100.000,- | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| 253434 | Maskinútgerð ..... | 83.405,88 | 160.000,- | 150.000,- | 150.000 | 150,0 | 150,0 |
| 253442 | Skipasmiðjuútreiðslur ... | 281.273,29 | 200.000,- | 400.000,- | 400.000 | 400,0 | 400,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 127.325,62 | 70.000,- | 370.000,- | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| | | **6.164.256,34** | **6.580.000,-** | **7.689.876,-** | **7.419.876** | **7.419,9** | **7.419,9** |

**Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1983/84**
**Rakstrarstað 16334: »Ólavur Halgi«**

| Kontonr./navn | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 1000 kr. | Ætlan 1985/86 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur ..... | 65.703,00 | | | | | |
| 103143 | Løn - starvsfólk ..... | 2.800.438,71 | 3.082.500,- | 3.301.880 | 3.301.880 | 3.301,9 | 3.301,9 |
| 103151 | Løn - avloysarar ..... | 296.717,94 | 50.000,- | 80.000 | 80.000 | 80,0 | 80,0 |
| 103405 | Løn - úrtíðarløn ..... | 11.240,16 | 25.000,- | 20.000 | 20.000 | 20,0 | 20,0 |
| 123103 | Skeið ..... | 10.066,80 | 20.000,- | 30.000 | 30.000 | 30,0 | 30,0 |
| 213702 | Ognar- og vanlukkutrygg . | 271.518,25 | 250.000,- | 250.000 | 250.000 | 250,0 | 250,0 |
| 253107 | Kostur - búnyttur - vask .. | 193.501,05 | 255.000,- | 285.000 | 285.000 | 285,0 | 285,0 |
| 253306 | Nav. amboð ..... | 96.976,59 | 65.000,- | 100.000 | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| 253418 | Olja ..... | 1.550.750,66 | 1.800.000,- | 2.025.000 | 2.025.000 | 2.025,0 | 2.025,0 |
| 253426 | Deksútgerð ..... | 79.239,65 | 100.000,- | 100.000 | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| 253434 | Maskinútgerð ..... | 206.556,91 | 180.000,- | 150.000 | 150.000 | 150,0 | 150,0 |
| 253442 | Skipasmiðjuútreiðslur ... | 885.806,00 | 450.000,- | 400.000 | 400.000 | 400,0 | 400,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 99.335,62 | 70.000,- | 370.000 | 100.000 | 100,0 | 100,0 |
| | | **6.436.445,34** | **6.347.500,-** | **7.111.880** | **6.841.880** | **6.841,9** | **6.841,9** |

**Viðmerkingar til tær ymisku konti á fíggjarætlanini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni**

*Rakstrarstað 16301 Skrivstovan*
Lønarkonti 103048 og 103143 eru útroknaðar sambært skriv frá Landsstýrinum dagf. 16. aug. 1982.

Konto 213105 er hækkað samsvarandi væntandi útreiðslum.

Konto 213806 er hækkað samsvarandi leigusáttmála, ið er prístalsviðgjørdur.

Konto 233354 er hækkað samsvarandi væntandi útreiðslum.

Konto 253969 er hækkað orsakað av vaksandi útreiðslum til ábøtur av verandi amboðum, so sum útbyggjan av datamaskinu fyri umframt at máta aldur eisini at máta vindin.

Konto 253985 er hækkað við kr. 3.000,- til hvørt av bjargingarfeløgunum.

*Rakstrarstað 16315 »Tjaldrið«*
Lønarkonti 103143, 103151 eru útroknaðar sambært skriv frá Landsstýrinum dagf. 16. aug. 1982.

Konto 103405 er lækkað, hetta kemst av, at arbeiðið hjá manningini er soleiðis tilrættalagt, at sleppast kann undan ov nógvari úrtíðarløn.

Konto 253442 er hækkað, av tí at skipasmiðjuumvælingar eru ógvuliga kostnaðarmiklar.

Konto 253903 er hækkað munandi, og kemst hetta av, at ætlanin er at útvega ein dekompressiónstanga.

Aðrar hækkingar og lækkingar eru gjørdar eftir væntandi nýtslu.

*Rakstrarstað 16334 »Ólavur Halgi«*
Her eru stórt sæð somu hækkingar og lækkingar sum undir rakstrarstað 16315.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**
Landsstýrið tekur ikki undir við ætlanunum um at útvega dekompressiónstanga til Tjaldrið og Ólav Halga.

**Ad § 16-16403 Laksa- og sílaaling**

Sbrt. skriv dagf. 22. oktober 1982 frá Fiskirannsóknarstovuni:

**Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84**
Rakstrarstað 16403: Laksa- og sílaaling

| í 1.000 kr. | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Laksa- & sílaaling | 700 | 800 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

**Viðmerking**
Sum kunnugt eru vit í ferð við at útbyggja alistøðina við Áir. Eitt hús er bygt og tikið í brúk, og 2 hús eru í gerð. Fyrsta húsið kostaði um 5 mill. kr. og er lutvíst fíggjað við láni, stórt 3 mill. kr., úr Ídnaðargrunninum. Kostnaðarætlanin fyri hini 2 húsini er um 8 mill. kr. Sum lán er játtað 2,5 mill. kr. úr Ídnaðargrunninum og 3,5 mill.kr úr Menningargrunninum. Restin er ætlað fíggjað við studningi úr landskassanum og við eginpeningi. Viðmerkjast skal, at p/f Fiskaaling í ár hevur útflutt og selt fyri um 5 mill. kr. ímóti gott 3 mill. kr. í 1981.

---

**Ad § 16 - 16607 Fiskivinnuráð**

| í 1.000 kr. | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan 1984/85 | Ætlan 1985/86 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 131 | 223 | | 123 | 123 | 123 |

**Ad § 16 - 16904/333017 Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna**

Smbrt. skriv frá Lønjavningargrunninum dagfest 4. oktober 1982

| | |
|---|---|
| Minstaløn | 8.031.066,00 |
| Minstivinningur | 924.640,00 |
| Prísískoyti til saltfisk | 3.811.448,00 |
| Útróðrarstudningur | 4.963.860,61 |
| Landingarstudningur, mynstrað skip | 6.100.692,00 |
| Flakastudningur | 528.434,00 |
| Hemara- og svartkalvastudningur | 239.103,00 |
| Ídnaðarstudningur | 3.388.361,00 |
| Agnstudningur | 8.415.424,97 |
| Rakstrarstudningur | 45.316.162,80 |
| Brennioljustudningur | 42.457.448,46 |
| Flutningsstudningur | 338.537,00 |
| Frítíðarløn | 1.441.957,00 |
| Studningur til Ráfiskagrunn | 72.000.000,00 |
| Fyrisæti | 1.496.379,41 |
| Rentuútreiðslur | 350.113,25 |
| Avskriving uppá innbúgv | 3.597,30 |
| | **199.807.224,80** |

Útgoldið frá 1. apríl til 16. september 1982:

| | |
|---|---|
| Minstaløn | 2.564.798,00 |
| Minstivinningur | 274.865,00 |
| Prísískoyti til saltfisk | 1.958.430,00 |
| Flakastudningur | 376.972,00 |
| Útróðrarstudningur | 1.785.163,73 |
| Rakstrarstudningur | 24.121.537,58 |
| Landingarstudningur, mynstrað skip | 3.246.659,00 |
| Frítíðarløn | 1.415.676,00 |
| Brennioljustudningur | 19.845.721,20 |
| Ídnaðarstudningur | 2.919.064,00 |
| Agnstudningur | 2.378.143,20 |
| Flutningsstudningur | 291.666,15 |
| Studningur til Ráfiskagrunn | 30.000.000,00 |
| Fyrisæti | 793.849,61 |
| Rentuútreiðslur | 230.207,26 |
| | **92.202.752,73** |

**Ad §17 - 17015 Landsdjóralækni**

Smbrt. skriv dagfest 24. september 1982.

Ad. 103048: 1 landsdjóralækni
Ad. 103168: 1 hjálpardjóralækni, sáttmáli ..... kr. 166.718,86
eftirlønargjald .... — 16.671,89
deildarleiðaraviðbót — 25.000,00
reiðiviðbót ..... — 43.185,00
ymiskt ..... — 2.496,00
frítíðarmisjavni ... — 3.027,96

Lagt er upp fyri eini aldursviðbót pr. 1. juli 1983 og væntaðari hækking fram til 31. mars 1984 í sama mun sum higartil.

Ad 253903: Aðrar útreiðslur: Lýsingar, skrivstovulutir, prent, tíðarrit, gjald fyri virologiskar kanningar o.a., sum neyðugt er at fáa gjørt á Statens veterinære Serumlaboratorium. Hetta hevur áður verið ókeypis, men síðan í fjør hevur gjald verið kravt hiðani.

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 1000 kr. | Ætlan 1985/86 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn ..... | 247.066,56 | 250.0 | 264.4 | 264,4 | 264,4 | 264,4 |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn ..... | 206.375,21 | 203.0 | 257.1 | 257,1 | 257,1 | 257,1 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur ..... | 25.406,25 | 35.0 | 40.0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 3.000,00 | 3.0 | 3.0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| 233259 | Postgjald ..... | 463,00 | 1.0 | 1.0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| 233354 | Telefon/telex ..... | 3.768,50 | 5.0 | 5.6 | 5,5 | 5,5 | 5,5 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 11.460,20 | 11.0 | 20.0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| **17015** | **Landsdjóralæknaembætið .....** | **497.539,72** | **508.0** | **591.1** | **591,0** | **591,0** | **591,0** |

## Ad §17 - 17048 Landbúnaðarráðgevarin

Sbrt. skriv dagf. 21. sept. 1982:

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot landsstýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 1000 kr. | Ætlan 1985/86 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn - tænastumenn | 170.658 | 180.000 | 195.000 | 195.000 | 195,0 | 195,0 |
| 103222 | Løn - reingerð, el og hiti | — | 12.000 | 14.000 | 14.000 | 14,0 | 14,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpening innanlands | 34.323 | 30.000 | 35.000 | 35.000 | 35,0 | 35,0 |
| 233051 | Innbúgv | — | 3.000 | 5.000 | 5.000 | 5,0 | 5,0 |
| 233155 | Prentlutir | 3.418 | 3.000 | 5.000 | 5.000 | 5,0 | 5,0 |
| 233259 | Postgjald | 660 | 1.000 | 1.500 | 1.500 | 1,5 | 1,5 |
| 233354 | Telefon og telex | — | 6.000 | 7.000 | 7.000 | 7,0 | 7,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 1.330 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2,0 | 2,0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur (skeið o.a.) | — | 7.000 | 8.000 | 8.500 | 8,5 | 8,5 |
| **17045** | **Landbúnaðarráðgevarin** | **210.391** | **244.000** | **272.500** | **273.000** | **273,0** | **273,0** |

**Ad § 17-17053 Seyðaráðgevarin**

Sbrt. skriv dagf. 23. okt. 1982:

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1981/82 | Játtan 1982/83 | Uppskot stovnsins 1983/84 | Uppskot Lands-stýrisins 1983/84 | Ætlan 1984/85 1000 kr. | Ætlan 1985/86 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 103509 Samsýningar ..... | 60.000 | 60.000 | 72.000 | 66.000 | 66 | 66 |
| 113202 Ferðaútreiðslur ..... | 12.806,02 | 14.000 | 15.000 | 15.000 | 15 | 15 |
| 253903 Aðrar útreiðslur: | | | | | | |
| Føroya Tøðfelag - Sand, Gøtu, Oyri . | 15.400 | | | | | |
| Vaccina - Oyri ..... | 386,50 | | | | | |
| Føroya Búnaðarfelag, nylonhegn útskift - Oyri ..... | 1.393,50 | | | | | |
| Føroya Jarðarráð, seyðahúslán - Oyri | 11.875,20 | | | | | |
| Annað ..... | 1.316,25 | | | | | |
| Føroya Tøðfelag, kunsttøð - Fámjin Gøtu, Oyri ..... | 17.870,00 | | | | | |
| | 51.408,45 | 45.000 | 60.000 | 54.000 | 54 | 54 |
| Íalt ..... | 124.214,47 | 119.000 | 147.000 | 135.000 | 135 | 135 |
| Játtan 1981-82 ..... | 115.000,00 | | | | | |
| Brúkt meir enn játtað ..... | 9.214,47 | | | | | |

Sbrt. skriv frá seyðaráðgevaranum dagf. 23. okt. 1982:

*Viðmerkingar til uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84*
Í brævi í august í ár viðvíkjandi fíggjarætlan fyri komandi fíggjarár biður landsstýrið um, at ætlan eisini verður gjørd fyri fíggjarárini 1984/85 og 1985/86.

Av tí at eingi tøl á fíggjarætlanini til seyðaráðgevaran flyta seg av sær sjálvum — vegna dýrtíð og prístal — er tað ikki so lætt at seta tølini so langt fram, men um hjálagda uppskot fyri 1983/84 verður fylgt í ár, kann alt arbeiðið ganga betur og røkka longri enn higartil, og eg vil meta, at hesi tølini kunnu røkka til eini 3 ár fram.

**Ad § 17-17103 Matrikulstovan**

Sbrt. skriv dagf. 5. oktober 1982:

Við hesum verður uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84, samanborin við roknskapin 1981/82 og játtanina 1982/83, somuleiðis ætlan fyri 1984/85 og 1985/86, send Landsstýrinum.

| | | Roknsk. 1981/82 1000 kr. | Játtan 1982/83 1000 kr. | Uppskot stovnsins 1983/84 1000 kr. | Uppskot landsstýrisins 1000 kr. | Ætlan 1984/85 1000 kr. | Ætlan 1985/86 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | løn tænastumenn .. | 849.5 | 874.0 | 1.108,0 | 966,0 | 966,0 | 966,0 |
| 103143 | — starvsfólk ..... | 2.497.3 | 2.790.0 | 3.000,0 | 2.913,0 | 2.913,0 | 2.913,0 |
| 103222 | — reingerð ..... | 72.7 | 70.0 | 120.0 | 120,0 | 120.0 | 120.0 |
| 103288 | — bønafólk ..... | 91.8 | 100.0 | 120.0 | 120,0 | 120.0 | 120.0 |
| 113202 | ferða- og dagpening. | 158.3 | 150.0 | 160.0 | 160,0 | 160,0 | 160,0 |
| 213806 | leiguútreiðslur ..... | 182.9 | 260.0 | 285.0 | 285,0 | 285.0 | 285.0 |
| 213105 | el - hiti og vask .... | 40.8 | 30.0 | 75.0 | 75,0 | 75.0 | 75.0 |
| 253306 | amboð-keyp-umsiting | 178.4 | 150.0 | 650.0 | 650,0 | 650.0 | 650.0 |
| 233051 | innbúgv ..... | | | 25.0 | 25,0 | 25.0 | 25.0 |
| 253928 | tænastuakfør ..... | 149.7 | 150.0 | 70.0 | 70,0 | 170.0 | 70.0 |
| 253123 | tilfar - skrivst.tekn... | 117.5) | | | | | |
| 253123 | — uppmáling ... | 33.7 | 550.0 | 550.0 | 550,0 | 550.0 | 400.0 |
| 253123 | — fotokop. o.a.. | 219.2) | | | | | |
| 253123 | kortkonstr. - luftfoto | 298.6) | | | | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233259 | postgjald ..... | 10.3 | 15.0 | 15.0 | 15,0 | 15.0 | 15.0 |
| 233354 | telefon, lýsingar .... | 42.4 | 40.0 | 85.0 | 85,0 | 75.0 | 75.0 |
| 253903 | aðrar útreiðslur .... | 73.4 | 60.0 | 60.0 | 60,0 | 60.0 | 60.0 |
| 83904 | inntøkur ..... | ÷ 1.591.5 | ÷ 1.300.0 | ÷ 1.500.0 | ÷ 1.500,0 | ÷ 1.500.0 | ÷ 1.700.0 |
| | | **3.425.0** | **3.939.0** | **5.223,0** | **4.594,0** | **4.684,0** | **4.234,0** |

**Viðmerkingar til uppskotlð:**
Roknað er við hesi manning:

*Tænastumenn:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| stjóri ..... | 36. | lønarramnu | |
| 1 landmálari ..... | 31. | — | |
| 1 — ..... | 29. | — | |
| 2 hjálparlandmálarar .... | 20. | — | (matrikulteknikarar) |
| 1 — .... | 17. | — | (matrikulteknikari) |

*Sáttmálalønt fólk:*
1 landmálari — løntur eftir sáttmála fyri »Statsansatte landinspektører«.
3 landmálarar — løntir eftir sáttmála fyri sivilverkfrøðingar.
7 hjálparlandmálarar — løntir eftir sáttmála við Teknikarafelagið.
1 næmingur — løntur eftir sama sáttmála.
4 teknarar — løntir eftir sama sáttmála.
1 næmingur — løntur eftir sama sáttmála.
1 bókhaldari — løntur eftir sáttmála við Starvsmannafelagið.
1 yvirassistentur — løntur eftir sama sáttmála.
4 skrivstovufólk — lønt eftir sama sáttmála.
2 fotoarbeiði o.a. — lønt eftir sama sáttmála.

**Lønir:**
*Tænastumenn:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| stjóri ..... | kr. | 238.251,- | |
| landmálari 1 ..... | — | 217.650,- | |
| — 2 ..... | — | 201.943,- | |
| matrikulteknikari 1 ..... | — | 154.230,- | |
| — 2 ..... | — | 154.230,- | |
| — 3 ..... | — | 141.671,- | |
| | kr. | 1.107.975,- | |

*Starvsfólk:*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| landmálari 3 ..... | kr. | 256.740,- | (íroknað eftirløn) | | |
| — 4 ..... | — | 228.020,- | — | — | |
| — 5 ..... | — | 174.481,- | — | — | |
| — 6 ..... | — | 153.912,- | — | — | |
| matrikulteknikari 4 ..... | — | 147.729,- | | | |
| — 5 ..... | — | 147.729,- | | | |
| — 6 ..... | — | 147.729,- | | | |

Somuleiðis verður søkt um at fáa serútbúgvið fólk til fotodeildina, og verður víst til viðløgdu frágreiðing um kortdeild á Matrikulstovuni.

*103222* Við tað, at Matrikulstovan fær størri høli, er roknað við, at útreiðslan til reingerð verður 120 tús.

*103288* Her verður víst til roknskapin 1981/82, og at tann 1. okt. 1982 vóru nýttar kr. 86.000,-.

Internationala samskipanin IAESTE hevur seinastu árini biðið um, at Matrikulstovan tekur studentar, serliga verkfrøðingar við landmátingsútbúgving, til praktiska uppvenjing í 1-2 mánaðir um summarið.

Tá hetta er tann tíðin, ið Matrikulstovan serliga hevur brúk fyri fólki til útiarbeiði, er roknað við 2 studentum komandi summar.

*113202* Víst verður til roknskapin 1981/82 og játtanina 1982/83.

*213806* Roknað er við eini gólvvídd stór 830 m², og er kostnaðurin í løtuni kr. 340,- pr. m² um árið, viðmerkt verður, at sáttmálin við P/f DYGD gongur út 1. aprfl 1983.

*213105* Í 1981/82 vóru nýttar 40 tús. Við øktum oljuprísi, elprísi og størri hølum er útreiðslan ætlað til 75 tús.

*233051* Matrikulstovan hevur onga konto til innbúgv, henda útreiðsla verður bókað á amboðskontoina.

Í sambandi við, at størri høli verða tøk, er ætlanin at keypa kortskáp o.a., og man tað vera rætt at hava eina serliga konto til tílíkar útreiðslur.

*253306* Her verður bókað landmátingsinstrument, skrivi- og roknimaskinur, játtanin 1982/83 er 150 tús.

Viðvíkjandi upphæddini 650 tús. verður víst til hjáløgdu frágreiðing um kortdeild á Matrikulstovuni.

*253928* Í uppskotinum er bert roknað við umsiting av bilunum, sum Matrikulstovan hevur.

*253123* Víst verður til frágreiðing til fíggjarætlan 1982/83, og við tað at luftfotograferingin, sum skuldi fremjast summarið 1982, lutvíst miseydnaðist, verður sett av til nýggja flúgving komandi summar.

*233354* Matrikulstovan hevur ein vekslara, sum er stívliga 20 ára gamal, og eru einans 3 linjur tøkar. Hetta má haldast at vera í minna lagi, tá hugsað verður um, at 26 fólk starvast við stovnin.

Kostnaðurin fyri ein nýggjan vekslara er umleið 35 tús. (leiga 27 tús., innlegging 8 tús.), og er uppskotið hækkað samsvarandi hesum.

*83904* Inntøkurnar eru mettar til 1.5 mill. — harav umleið 650 tús. fyri sundurbýtisgjøld o.a. Í 1981 vórðu skrásett 785 matr. nr. og brúk nr., 580 umskipanir av markum, 100 samanleggingar, 69 marknasetingar o.a.

| | | | |
|---|---|---|---|
| — | 7 ..... | kr. | 147.729,- |
| matrikulteknikari | 8 ..... | — | 131.680,- |
| — | 9 ..... | — | 131.204,- |
| — | 10 ..... | — | 129.778,- |
| næmingur | 1 ..... | — | 51.673,- |
| tekniskur teknari | 1 ..... | — | 76.169,-(arb. 1/2 dag) |
| — — | 2 ..... | — | 141.053,- |
| — — | 3 ..... | — | 126.400,- |
| — — | 4 ..... | — | 123.270,- |
| næmingur | 1 ..... | — | 47.543,- |
| bókhaldari | 1 ..... | — | 155.460,- |
| yvirassistentur | 1 ..... | — | 150.510,- |
| skrivstovufólk | 1 ..... | — | 137.460,- |
| — | 2 ..... | — | 68.730,-(arb. 1/2 dag) |
| — | 3 ..... | — | 122.310,- |
| — | 4 ..... | — | 121.710,- |
| fotoarbeiði o.a. | 1 ..... | — | 131.010,- |
| — | 2 ..... | — | 150.000,- |
| | | kr. | 3.400.029,- |
| | | **tilsaman** | **kr. 4.508.004,00** |

Hvat lønum viðvíkur, verður víst til leiðbeining landsstýrisins, og er roknað við lønini 1. juli 1982, somuleiðis 5 prístalsviðbótum og teimum aldursviðbótum, ið gera seg galdandi í fíggjarárinum 1983/84.

*103048* Tænastumannastarvið sum hjálparlandmálari (matrikulteknikari 3) er ongantíð sett, men í uppskotinum er roknað við, at landsstýrið broytir normeringina, soleiðis at allir máliteknikararnir fáa umtrentliga somu løn.

*103143* Í uppskotinum er roknað við tí fólki, sum arbeiðir við stovnin í dag, at settur verður 1 landmálari, 1 fotografur og 2 næmingar afturat.

Matrikulstovan søkti í seinasta fíggjarlógaruppskoti um at seta ein landmálara afturat, og tá umsóknin ikki vann sømdir, verður søkt av nýggjum.

Viðvíkjandi næmingum verður víst á, at á teknistovuni arbeiða 4 fólk, harav 2 í komandi fíggjarári hálvan dag, og at 1 máliteknikari verður loystur úr starvi vegna aldur.

Hinar inntøkurnar er eigaranna partur av útskiftingarkostnaði og kommunali parturin av matrikuleringsarbeiði, sølu av kortum, myndum o.ø.

Viðvíkjandi ætlan fyri 1984/85 skal viðmerkjast, at roknað er við somu útreiðslum og inntøkum, tó verður neyðugt at keypa nýtt tænastuakfar í hesum fíggjarári, og eru útreiðslurnar hækkaðar samsvarandi hesum.

Í ætlanini fyri 1985/86 er útreiðslan til kortkonstruktión minkað við 150 tús. og inntøka økt við 200 tús., tá roknað verður við, at stovnurin verður førur fyri at framleiða ein stóran part av tí kortarbeiði, sum nú verður gjørt uttanlands.

---

*Skjal II*

| Heiti (1) | Lønarflokkur ella líknandi (2) | Tal av størvum játtað á fíggjarlóg 1982/83 (3) | søktar nýjáttanir 1983/84 (4) | tilsamans søkjast 1983/84 (5) = (3) + (4) | løn (6) |
|---|---|---|---|---|---|
| *Tænastumenn:* | | | | | |
| Stjóri ..... | 36 | 1 | 0 | 1 | |
| Landmálari ..... | 31 | 1 | 0 | 1 | |
| — ..... | 29 | 1 | 0 | 1 | |
| Matr. teknikarar . | 20 | 2 | 0 | 2 | |
| — — . | 17 | 0 | 1 | 1 | |
| *Starvsfólk:* | | | | | |
| Landmálari ..... | statsansatte landinspek. | 1 | 0 | 1 | |
| — ..... | sivilverkfr. 3. flokkur | 2 | 1 | 3 | |
| Matr. teknikarar . | teknikarafel. 4. flokkur | 7 | 0 | 7 | |
| Tekn. teknarar .. | teknikarafel. 2. flokkur | 4 | 0 | 4 | |
| Bókhaldari ..... | starvsmannaf. 16. flokkur | 1 | 0 | 1 | |
| Yvirassistentur .. | starvsmannaf. 15. flokkur | 1 | 0 | 1 | |
| Skrivstovufólk .. | starvsmannaf. 9. flokkur | 4 | 0 | 4 | |
| Fotoarbeiði ..... | starvsmannaf. | 1 | 1 | 2 | |
| *Tímalønt:* | | | | | |
| Reingerð ..... | F. Arb. felag | 2 | 0 | 2 | |
| *Næmingar:* | | | | | |
| Matr. teknikari .. | teknikarafel. 2. ár | 0 | 1 | 1 | |
| Tekn. teknari ... | teknikarafel. 2. ár | 0 | 1 | 1 | |
| *Onnur:* | | | | | |

*Frágreiðing um keyp av fotogrammetriskum tólum til kortframleiðslu ad konto 253306*

Tey arbeiði, Matrikulstovan røkir, eru fyrst og fremst skráseting av øllum føstum eigindómi, umsiting av matriklinum, so hvørt sum skrásetingin av tí einstøku bygdini fer fram, og útskifting innan- og uttangarðs.

Síðani 1965, tá byrjað var við fotogrammetriskari uppmáling, hevur Matrikulstovan útvegað kort í stórum máti til planleggingaruppgávur, og í dag er støðan tann, at einki veruligt byggiarbeiði fer í gongd, fyrr enn stovnurin hevur útvegað kort/projekteringsgrundarlag.

Henda kortlegging í 1:1.000 fevnir um mest sum allar bygdirnar innangarðs, part av láglendinum og stóran part av landsveganetinum — umleið 1000 kortbløð í A1 formati.

Eigindómsviðurskiftini verða viðlíkahildin, so hvørt sum broytingarnar fara fram, og verða kortini ført ajour í tveimum planum, ein, ið vísir matrikuleru viðurskiftini við broytingum stig fyri stig, og ein annar planur ajourførður, har øll broytt mark eru burturtikin — prentoriginalurin.

Meðan eigindómsviðurskiftini soleiðis verða regluliga ført ajour á kortinum, verður lítið og einki gjørt við ajourføring av øðrum broytingum, t.d. hús og onnur teknisk jarðføst útbygging.

Síðani matrikuleringin varð framd í Tórshavn, hevur Matrikulstovan eina ferð ført kortini ajour fyri kommununa, hvat húsum viðvíkur.

Úti um landið liggur henda ajourføring mestsum heilt á láni.

Fyri kommunala planlegging er neyðugt, at hetta arbeiðið verður gjørt, og er hetta ein natúrlig uppgáva hjá Matrikulstovuni at fara undir.

Av øðrum kortum kunnu nevnast máliborðsbløðini í 1:20.000, sum Geodætisk Institut hevur ábyrgdina av.

Sum víst í uppskoti til fíggjarætlanina 1982/83 varð nýggj flúgving løgd til rættis fyri summarið 1982, ið m.a. skuldi nýtast til at gera nýggj grundkort fyri Føroyar eftir, men tá henda flúgvingin partvíst miseydnaðist í ár, er hon skotin út til summarið 1983.

Henda flúgvingin var løgd soleiðis tilrættis, at møguleiki varð at útteikna kort í 1:4.000, ið tørvur er á til ymiskar útbyggingar, planlegging v.m.

Við teimum íløgum, ið nevndar eru í sambandi við t.d. vatnútbyggingina, metir Matrikulstovan, at hetta arbeiðið ikki verður framt, fyrr enn eitt betri kortgrundarlag fyriliggur (vegir, tunnlar og byrgingar),

og er hetta eisini galdandi fyri arealplanleggingina yvirhøvur.

Viðmerkt verður, at prinsippið fyri framleiðslu av sjókortum ikki víkur stórvegis frá tí, ið er galdandi fyri kort á landi.

Tey tól, sum skulu til fyri at framleiða kort úr myndatilfarinum, eigur Matrikulstovan ikki, og er hetta konstruktiónsarbeiði gjørt av privatum feløgum í Noreg ella Danmark — árliga útreiðslan er um 2-300.000 kr., og verður henda útreiðslan nógv størri, tá talan verður um at bjóða út kortini í 1:4.000, tí her verða økini stór, heilar oyggjar og partar av oyggjum.

Matrikulstovan hevur tí seinastu árini arbeitt við hugsanini at gera eina kortdeild, ið er før fyri at røkja hesa uppgávu, ið natúrliga eigur at verða stýrd frá hesum stovni. Vit hava nakað av royndum í tíðini frá 1965-1982 og landmálarar og máliteknikarar, sum við nakað av serútbúgving kunnu røkja hesa uppgávuna.

Í uppskoti til fíggjarlóg 1983/84, 1985/86 verður tí biðið um eina serliga játtan til keyp av tekniskari útgerð yvir 3 ár. Í hesum tíðarskeiði er so ætlanin at byggja út eina kortdeild, ið er før fyri at átaka sær alla kortlegging, tó undantikið topografisku kortini, sum Geodætisk Institut hevur um hendi.

Henda útbyggingin umfatar fotoarkiv, konstruktiónsamboð og tekniborð við tilhoyrandi automatikki.

Roknað verður við, at tey programm, ið skulu nýtast til data-stýringina, og sum ikki fylgja við í keypinum sum higartil, verða gjørd av fólki, sum arbeiðir við stovnin.

Hvat fólki viðvíkur, verður neyðugt at seta ein fotograf við serkunnleika á hesum øki.

Kostnaðurin yvir 3 ár er mettur til kr. 400.000,- um árið.

---

**Viðmerking frá landsstýrinum:**

Ikki játtað 1 matrikulteknikara afturat
— — 1 landmálara afturat
— — 1 fotoarbeiðara afturat
— — 1 matrikulteknikaralærling
— — 1 tekniskan teknaralærling.

| lagt niðurfyri til møguliga eykahjálp | | — 96.000,- |
| tilsamans | | **kr. 400.000,-** |

*7) Trygging:*

Sambært upplýsingar frá Tryggingarsambandinum,
**alt talt við** ..... kr. 1.500.000,-

*8) Havna- loðsgjald og klarering:*

Hanstholm:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Klarering + 15% yvirtíð ..... | kr. | | 6.698,- |
| Skipsavgift 1,85 × bruttotons ... | — | | 13.875,- |
| ./. 3/4 av skipsavgift (meira enn 12 túr.) ./. ..... | — | | 10.406,- |
| loðsur ..... | — | | 1.452,- |
| total ..... | kr. | | 11.619,- |
| 14 vikur ..... | | kr. | 162.673,- |

Tórshavn:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1,80 × netto (4500) ..... | kr. | 8.100,- | |
| í 14 vikur 14 × 3 × 8.100 ..... | | — | 340.200,- |

Seyðisfjørður:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Havnagjald | ÍSL. kr. | 3.173,- | |
| kursur-ÍSL. kr./D.kr. bryggjugjald | — — | 3.173,- | |
| 2100 Ísl.kr. pr. 1000 D.kr. klarering | — — | 6.500,- | |
| | ÍSL. kr. | 12.846,- | |
| | ./. 2100 | — | 6.117,- |
| ialt 6117 × 14 = | | — | 85.638,- |
| vitagjald 6 túrar $\frac{(6 \times 32718)}{210}$ | kr. | 93.480,- | |
| ialt Seyðisfjørður í 14 vikur | | — | 179.118,- |

Scrabster:

| | | |
|---|---|---|
| Scrabster Harbour er privat ogn. Teir siga, at vit kunnu tosa um tað, tá ið skipið er komið. Tað skal so ikki verða dýrari enn Smyril, men vit avseta so ..... | — | 150.000,- |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bergen: | | | |
| Loðs inn-út | kr. 13.216,- | | |
| loðs ferðapeningur | — 1.000,- | | |
| klarering | — 3.500,- | | |
| terminalleiga | — 4.500,- | | |
| havnapengar | — 1.500,- | | |
| | kr. 23.716,- | | |
| | × kurs 120 = | kr. 28.459,- | |
| totalt 28 túrar: | 28.459 × 28 = | | — 1.593.704,- |
| total | | | **kr. 2.425.695,-** |

*9) Lossing og lasting* sí pkt. 24

| | | | |
|---|---|---|---|
| *10) Lønir og umsiting* ..... | kr. | 500.000,- | |
| ferðamannadeild ..... | — | 545.000,- | |
| eyka summar ..... | — | 55.000,- | |
| vakt »bryggja« ..... | — | 40.000,- | |
| bókhald ..... | — | 55.000,- | |
| pakkhús ..... | — | 54.000,- | — 1.249.000,- |
| húsaleiga ..... | — | 100.000,- | |
| ljós-hiti ..... | — | 24.000,- | |
| skrivstovuhald ..... | — | 100.000,- | |
| grannskoðan ..... | — | 70.000,- | |
| tlf.-telex ..... | — | 200.000,- | |
| annað ..... | — | 57.000,- | kr. 1.800.000,- |

*11) Lýsingar og marknaðarførsla:*
Samlaðar útreiðslur ..... — 1.500.000,-

*12) provisión* ..... — 4.287.500,-

*13) Koyggju og arbeiðsklæðir:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Vit ætla at eiga koyggjulinned sjálvir og vaska í landi fyri ca. 10,- kr. settið. | | | |
| 70.000 ferðafólk + manning = 71.200 × 10 = | | kr. 712.000,- | |
| arbeiðsklæðir til manning + reinsing og svinn ..... | — | 288.000,- | kr. 1.000.000,- |

*14) Manko:*

| | | |
|---|---|---|
| Av tí at lítil og eingin frakt verður, er manko sett til ..... | — | 50.000,- |

*15) Ymiskt:*

| | | |
|---|---|---|
| Samlaðar ymiskar útreiðslur incl. svinn, kabúss og rest ..... | — | 450.000,- |

| | | |
|---|---|---|
| *16) Tap av debitorum* (samanlíknað við Smyril) ..... | — | 50.000,- |

*19) Ferðaseðlar (ferðafólk):*

Um vit nú samanbera tøl frá »Smyrli« við tað, ið vit meta er realistiskt, so eru ca. 9 vikur mitt um summarið, sum hava so at siga fullan belegning, meðan skipið vikurnar áðrenn og aftaná ikki hevur verið fullsett.

So er spurningurin, hvussu nógv meira ein kann rokna við í hásesongini, og hvussu nógv eitt egnað skip økir um ferðafólkatalið í lágsesongini. Gjøgnumsnittið á rutunum tær

| | |
|---|---|
| 9 vikurnar liggur uppá: | 377 ferðafólk og 80 bilar pr. túr |
| Gjøgnumsnittið á rutunum tær 5 vikurnar báðumegin við: | 170 ferðafólk og 40 bilar pr. túr |

Hetta eru tølini frá 1981.

Vit hava nú í hesi uppseting sett kr. 500.000,- meira av til marknaðarføring, og sjálvt um vit eru vorðnir nógv seinkaðir, meta vit at kunna tvífalda hesi soleiðis:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 9 vikur: ferðafólk | 377 × 8 × 9 × 2 | kr. | 54.288,- | | |
| 5 — — | 170 × 8 × 5 × 2 | — | 13.600,- | kr. | 67.888,- |
| 9 vikur: bilar | 80 × 8 × 9 × 2 | kr. | 11.520,- | | |
| 5 — — | 40 × 8 × 5 × 2 | — | 3.200,- | — | 14.720,- |

Um vit siga, at vit hava skotið 20% ov høgt, verður úrslitið:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ferðafólk | 67.888 ./. 13.577 | kr. | 54.311,-(55.000) |
| bilar | 14.720 ./. 2.944 | — | 11.776,-(11.800) |

Umbiðingarnar til »Smyril« 1/4-82 vóru 28583 — harav bert 22083 kundu váttast, meðan umbiðingarnar 15/4-81 vóru 12482. Hetta vísir ein vøkstur uppá 129% frá 1981 til 1982. Orsakað av, at íslandsrutan fyrst varð umbiðin og harav kom at virka sum ein fløskuhálsur ella ein forðan fyri, at meira kundi váttast — serstakliga á rutuni Scrabster/Seyðisfjørður og aftur, og ferðamannadeild Strandferðslunnar gjørdi sera neyvar »bookingar« fyri at umganga at fáa ov nógv fólk og ov nógvar bilar við, soleiðis sum hendi í 1981 við tí úrsliti, at eykafør máttu setast inn, fall talið av ferðafólki í mun til 1981.

Á rutuni Hanstholm-Bergen hevur Fred Olsen havt skip siglandi, og halda teir uppat, tá ferðaætlan Smyrils byrjar. Her koma vit at yvirtaka ein upparbeiddan heilársmarknað, og fer tað at fylla gott upp í sokallaðu »off-season«. Møguleiki er eisini fyri at yvirtaka teirra upparbeiddu pakkatúrar.
At vit hava fingið ein øktan hotellkapasitet við Hotel Føroyum, fer eisini at hækka ferðamannatalið til Føroya munandi. Henda øking hevur higartil ikki verið møgulig, so roknast kann eisini við øking í Føroyasiglingini eins og tann heilt trygga økingin til Íslands.

Við nýggju siglingini hjá M/F Eddu fara vit at missa ein stóran part av íslendskum ferðafólki, men hesin missur verður ikki stórur, tá hægsta talið av íslendingum við Smyrli hevur verið 3172, taldir báðar vegir.

Við øktari servicelegu, 800 koyggjur í mun til »Smyril« við 182,

verða eisini ferðaseðlarnir at vera av tí dýrara slagnum, og roknast má við eini væl hægri hækking fyri ferðafólkið enn vanliga.

M/F Smyril førdi í 1981 35516 ferðafólk, og inntøkan av hesum flutningi var kr. 13.886.398,05, ella í meðal kr. 391,- fyri ferðafólkið.

Í 1981 fall ferðafólkatalið til 31035 av kendum orsøkum, men inntøkan vaks til kr. 14.988.411,19, ella í meðal uppá ferðafólkið kr. 482,95. Ein vøkstur uppá 23,5%.

Í tølunum fyri M/F »Smyril« eru inntøkurnar fyri ferðafólk og bilar ikki greinaðar sundur, men vit síggja, at lutfalsliga vóru í 1981 4,68 ferðafólk uppá bilin, og í 1982 vóru ferðafólkini 4,55 uppá bilin.

Við ætlaða nýggja skipi má roknast við eitt sindur hægri ferðafólkakvotienti, og er talið tí mett til 4,66 ferðafólk uppá bilin, soleiðis sum uppstillingin vísir.

Verður sami rokningarháttur nýttur, verður meðalinntøkan fyri ferðafólkið kr. 610,-, ella ein hækking uppá 26%, sambært omanfyri nevnda.

Inntøka av ferðafólki
55000 ferðafólk á 550,- kr. ..... kr. 30.250.000,-

*20) Inntøka av bilum*

18.800 × 300 ..... — 3.540.000,-

*21) Søla til ferðafólk:*

her verður roknað við einari inntøku uppá
125,- kr. pr. ferðafólk 55.000 × 125 ..... — 6.875.000,-

*22) Valutakassi:*

5,- kr. vinning pr. ferðafólk
5 × 55.000 ..... — 275.000,-

*23) Provisiónir:*

Inntøka av provisiónum er roknað sum 1/4 av provisiónum fyri ferðaseðlasøluna hjá skipinum umframt provisiónina, sum ferðamannadeildin fær fyri sølu av øðrum ferðaseðlasølum ..... kr. 1.100.000,-

*24) Farmur:* — 4.000.000,-

Hetta eru nettotøl, eftir at lossing/lasting er farin frá. Vit vænta at fáa meginpartin av farminum millum Noreg-Danmark-Noreg og Ísland-Kontinentið-Ísland. Viðmerkjast skal, at P/F Skiparakstur, ið siglir uppá Ísland, ætlar at brúka hetta skipið (um tað kemur) til farmaflutning í summar. Eisini er upparbeiddur ein trailaraflutningur Bergen-Norðurjútland — í vetur við »Bolero«, sum gevst at sigla seinast í mai.

»Winston Churchill« flutti seinasta summar 4361 tons Føroyar-Danmark.

*26) Vetrarchartur:*

Hvat vetrarchartri sum avloysarar fyri onnur reiðarí viðvíkir, hava vit kannað møguleikar hjá P & O, umboð okkara, sum er størsta reiðarfið í Bretlandi við eini ferjudeild uppá yvir 20 skip. Hetta skipið, ið vit ætla at keypa, kann avloysa 8 av teirra ferjum. Teir rokna minst 14 dagar pr. skip í dokk.

14 × 8 = 112 dagar. Sjálvir sigla vit ca. 100 dagar í hásesong. P & O hevur sagt okkum, at teir eiga einki avloysaraskip og hava ikki ætlanir at keypa slíkt, men harafturímóti at chartra skip til hetta endamál. At finna nýtiligt avloysaraskip hevur verið meiri og meiri trupult fyri hvørt árið, og í vetur hevur borið av, av tí at reiðariini í Norðureuropa meira og meira hava síni skip í heilársvinnu.

Stjórin í P & O metir, at møguleikarnir fyri at hava skipið siglandi sum avloysaraskip meginpartin av vetrinum eru góðir. Charterprísurin fyri eitt skip av hesi stødd meta vit til ca. 100.000,- kr. pr. dag, hvar chartrari skal gjalda brennjolju og havna-loðs og lossilastikostnað. Hetta skuldi givið ca. 50.000,- kr. pr. dag í rakstraravlopi.

Fyri P & O í 16 vikur 112 × 50 = kr. 5.600.000,-

Onnur stór reiðarí, sum sigla í Norðsjónum og Kanalini, eru: TT-line, Brittany-Ferries, Sealink, Townsend-Thoresen og DFDS, sum í løtuni hevur fleiri av sínum ferðamannaskipum til sølu.

P & O stjórin skrivar soleiðis:

»In past years, many shipowners/operators on domestic and nearcontinent routes were able to meet their drydocking programmes by deploying ships within their respective fleets. However, increasing costs and the reduction in fleet size has led to the idea being raised between operators on more than one occasion for a »floater« in the season to satisfy the needs of all. This may be idealogical, but it does illustrate the need.«

Vit meta, at tað er møguleiki fyri at fáa eitt rakstraravlop av vetrarchartri uppá einar 7.000.000,-.

*Fígging:* Keypspeningurin fyri M/F Gustav Vasa er mettur til umleið 100 mill. kr., og umbyggingin av skipinum til umleið 15 mill. kr., soleiðis at samlaða íløgan verður uppá 115 mill. kr.

*Fíggingin verður ætlandi henda:*

1) 1. veðrættur til útlendskan banka yvir 11 ár — 2 ár avdráttarfrí. Restin yvir 9 árligar avdráttir. Renta 11% p.a.
1. veðrættur verður uppá 50% av íløguni, svarandi til ..... kr. 57.500.000,-

2) 2. veðrættur — seljarakredittur — yvir 7 ár — 2 ár avdráttarfrí — renta 14% p.a.
2. veðrættur verður uppá 10% av íløguni — svarandi til ..... — 11.500.000,-

3) 3. veðrættur — útlendsk bankalán yvir 11 ár — 2 ár avdráttarfrí. Restin yvir 9 árligar avdráttir. Renta 11% p.a.
3. veðrættur verður við Landskassaveðhaldi og verður uppá 30% av íløguni — svarandi til ..... — 34.500.000 -

| | | |
|---|---|---|
| 4) | Eginpeningur — 10% av fløguni ..... | — 11.500.000,- |
| | tilsamans ..... | **kr. 115.000.000,-** |

# Renta og avdráttir
# øll tøl í 1000 kr.

| Ár 1 | Avdráttir | Rentan | Avdráttir og rentur tilsamans | restskuld |
|---|---|---|---|---|
| lán 1 | 0 | — 6.325 | — 6.325 | — 57.500 |
| lán 2 | 0 | — 1.610 | — 1.610 | — 11.500 |
| lán 3 | 0 | — 3.795 | — 3.795 | — 34.500 |
| **tilsamans** | **0** | **— 11.730** | **— 11.730** | **— 103.500** |
| **Ár 2** | | | | |
| lán 1 | 0 | — 6.325 | — 6.325 | — 57.500 |
| lán 2 | 0 | — 1.610 | — 1.610 | — 11.500 |
| lán 3 | 0 | — 3.795 | — 3.795 | — 34.500 |
| **tilsamans** | **0** | **— 11.730** | **— 11.730** | **— 103.500** |
| **Ár 3** | | | | |
| lán 1 | — 5.390 | — 6.325 | — 12.710 | — 51.110 |
| lán 1 | — 2.300 | — 1.610 | — 3.910 | — 9.200 |
| lán 3 | — 3.830 | — 3.795 | — 7.625 | — 30.670 |
| **tilsamans** | **— 12.520** | **— 11.730** | **— 24.245** | **— 90.980** |
| **Ár 4** | | | | |
| lán 1 | — 6.390 | — 5.620 | — 12.010 | — 44.720 |
| lán 2 | — 2.300 | — 1.290 | — 3.590 | — 6.900 |
| lán 3 | — 3.830 | — 3.370 | — 7.200 | — 26.840 |
| **tilsamans** | **— 12.520** | **— 10.280** | **— 22.800** | **— 78.460** |

| **Ár 5** | **Avdráttir** | **Rentur** | **Tilsamans** | **Restskuld** |
|---|---|---|---|---|
| lán 1 | 6.390 | 4.929 | 11.310 | 38.330 |
| lán 2 | 2.300 | 970 | 3.270 | 4.600 |
| lán 3 | 3.830 | 2.950 | 6.780 | 23.010 |
| | **12.520** | **8.840** | **21.360** | **65.940** |
| **Ár 6** | | | | |
| lán 1 | 6.390 | 4.220 | 10.610 | 31.940 |
| lán 2 | 2.300 | 650 | 2.950 | 2.300 |
| lán 3 | 3.830 | 2.530 | 6.360 | 19.180 |
| | **12.520** | **7.400** | **19.920** | **53.420** |
| **Ár 7** | | | | |
| lán 1 | 6.390 | 3.510 | 9.900 | 25.550 |
| lán 2 | 2.300 | 320 | 2.620 | 0 |
| lán 3 | 3.830 | 2.110 | 5.940 | 15.350 |
| | **12.520** | **5.940** | **18.460** | **40.900** |
| **Ár 8** | | | | |
| lán 1 | 6.390 | 2.810 | 9.200 | 19.160 |
| lán 3 | 3.830 | 1.690 | 5.520 | 11.520 |
| | **10.220** | **4.500** | **14.720** | **30.680** |
| **Ár 9** | | | | |
| lán 1 | 6.390 | 2.110 | 8.500 | 12.770 |
| lán 3 | 3.830 | 1.270 | 5.100 | 7.690 |
| | **10.220** | **3.380** | **13.600** | **20.460** |

**År 10**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| lán 1 | 6.390 | 1.400 | 7.790 | 6.380 |
| lán 3 | 3.830 | 850 | 4.680 | 3.880 |
| | **10.220** | **2.250** | **12.470** | **10.240** |

**År 11**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| lán 1 | 6.380 | 700 | 7.080 | 0 |
| lán 3 | 3.860 | 420 | 4.280 | 0 |
| | **10.240** | **1.120** | **11.360** | **0** |

**182.395**

**pr. ár** **16.580**

**Skjal 10E**

# Stutt yvirlit yvir ætlaðu umbyggingina av »Gustav Vasa«

1. Verandi bildekk á kahytsdekki, spant 0-34, verður umbygt til 35 kømur (2 og 4 pers.) útgjørd við aircondition.
2. Bakarí við catering, spant 56-62
3. Storesrúm innrættast, spant 47-56
4. Bátadekkið verður útbygt aftureftir og innrættað sum dag- og náttsalon við sitiplássi fyri 200 persónum — útgjørd við klima-anleggi o.s.fr.
5. Installatión av finnu-stabilisatorum, spant 88 og frameftir
6. Installatión av 2 feskvatnsgeneratorum, kapacitetur 2-30 tons
7. Eyka síðuskrúva — drivin av hjálpimaskinarínum
8. Radio- og telegrafstøð (verandi støðin er leigað og verður tikin í land í sambandi við keypið) og radari
9. Skipasýniskrøv og broyting av hospitali v.m.

Tórshavn, 1. februar 1983

sign. Óli Hammer

**Skjal 11A**

# Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om børnetandpleje

I medfør af §9 i lov nr. 217 af 19. maj 1971 om børnetandpleje bestemmes, at loven, som den er ændret, træder i kraft på Færøerne i følgende skikkelse:

**§1.** Kommunerne indretter klinikker og ansætter tandlæger og hjælpepersonale i det omfang, det er nødvendigt for at sikre alle børn i den undervisningspligtige alder adgang til vederlagsfri forebyggende og behandlende tandpleje.

**§2.** Landsstyret kan, når særlige forhold taler derfor, godkende, at en kommune opfylder sin forpligtelse til at gennemføre den i §1 omhandlede vederlagsfrie tandpleje ved aftaler med privat praktiserende tandlæger og ved anvendelse af disses klinikker.

*Stk. 2.* Landsstyrets godkendelse efter stk. 1 forudsætter, at såvel den forebyggende som den behandlende børnetandpleje udføres lige så betryggende som i kommuner med kommunal børnetandpleje, jfr. §1.

**§3.** Landsstyret kan træffe afgørelse om hvilke kommuner, der sammen skal etablere en fælles børnetandplejeordning. Ligeledes kan landsstyret fastsætte reglerne for et sådant fællesskab.

*Stk. 2.* Ændring eller ophævelse af de nævnte fællesskaber kræver landsstyrets godkendelse.

**§4.** Regler om omfanget af og kravene til den af loven omfattede børnetandpleje fastsættes af indenrigsministeren efter forhandling med landsstyret.

**§5.** Retningslinjer for de kommunale børnetandplejeklinikkers indretning og drift fastsættes af sundhedsstyrelsen.

**§6.** Kommunalbestyrelser er forpligtet til efter regler fastsat af sundhedsstyrelsen at afgive oplysninger om virksomheden i medfør af denne lov.

**§7.** Anordningen træder i kraft den 1. august 198..

*Stk. 2.* Indtil den 1. august 198.. omfatter pligten efter § 1 kun børn i første skoleår og hjemmeunderviste børn på samme alderstrin. Indtil den 1. august 198.. omfatter pligten børn i første og andet skoleår og hjemmeunderviste børn på samme alderstrin og så fremdeles, indtil ordningen omfatter alle børn i den undervisningspligtige alder.

*Stk. 3.* Uanset bestemmelsen i stk. 2 kan landsstyret dog pålægge kommunalbestyrelser at gennemføre rimelige foranstaltninger til forebyggelse af tandsygdomme hos børn.

**§8.** Forslag om revision af anordningen fremsættes for lagtinget senest i lagtingssamlingen.

**Skjal 11 B**

# Álit og tilmæli frá nevndini viðvíkjandi skúlabarnatannarøkt v.m.

Á fundi í landsstýrinum 29. december 1977 varð samtykt at seta nevnd at kanna lóggávuna um skúlabarnatannarøkt, ortodontiska viðgerð, tannaviðgerð av evnaveikum børnum á Skúlanum á Trøðni og tannaviðgerð av sjúklingum á psykiatrisku deildini á Landssjúkrahúsinum.

Í nevndini skuldu sita:

1 limur eftir tilmæli frá landslæknanum, Sigvald Kristiansen, kommunulækni, Skála, varð tilnevndur.

1 limur eftir tilmæli frá Føroya Tannlæknafelag, Erling Johannesen, skúlatannlækni, Tórshavn, varð tilnevndur, frá 1981 Bogi á Steig, skúlatannlækni, Klaksvík.

1 limur eftir tilmæli frá Føroya Kommunufelag, Dánjal Tausen, bygdaráðsformaður, Sørvági, varð tilnevndur og

Johan Djurhuus, skrivstovustjóri.

Nevndin skipaði seg við Johan Djurhuus sum formanni og fekk sær Jóngerð Purkhús, fulltrúa, sum skrivara.

*ad 1. Skúlabarnatannarøktin.*

Tá ið nevndin varð sett, var í Danmark galdandi lóg nr. 217 frá 10. mai 1971 »om børnetandpleje«. Lógin legði ta skyldu á kommunurnar at gera tannlæknastovur og at seta tannlæknar og annað starvsfólk í tann mun, ið neyðugt er at tryggja øllum børnum í undirvísingarskyldugum aldri høvi til ókeypis fyribyrgjandi og viðgerandi tannarøkt. Í undantaksførum kunnu kommunur sleppa undan hesi skyldu, tó bert um kommunan í avtalu við privat praktiserandi tannlækna átekur sær at rinda útreiðslurnar av tannarøkt barna hjá honum, jbr. lógarbroytingar nr. 331 frá 10. juni 1976 og nr. 166

frá 6. mai 1980. Við lóg nr. 608 frá 14. december 1977 er lógin víðkað til at fata um øll børn, til undirvísingarskyldan heldur uppat.

Lógin ella onnur lóg á hesum øki er ikki galdandi í Føroyum, og liggur tí eingin lógarskylda á kommununum at røkja barnatannarøktina, lógin kann tó við neyðugum broytingum setast í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan.

At bøta um tannaviðgerðina samtykti løgtingið við løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 um tannlæknaskipan at geva landsstýrinum heimild til at skipa fyri, at tannlækni varð seltur í hvørjari kommunulæknadeild at viðgera øll skúlabørn í deildini og herumframt at gera annað tannlæknaarbeiði. Landsstýrið skuldi virka fyri semju millum kommunurnar í hvørjari kommunulæknadeild og millum kommunurnar og tannlæknan um samsýningina fyri viðgerð av skúlabørnum, um starvsstað tannlæknans, um kostnaðin av stovnan av tannlæknastovu, um tannlæknans nýtslu av tannlæknastovuni til viðgerð av egnum viðskiftafólki og um útreiðslurnar av flutningi av skúlabørnum frá bygdum, har tannlæknastova ikki er. Tá ið semja varð um setan av tannlækna í eini kommunulæknadeild, gjørdi landstýrið í samráð við fíggjarnevndina av, um studningur úr landskassanum skuldi latast til keyp av tólum til tannlæknastovuna við upp til 50% av kostnaðinum.

Lógin er skild og nýtt soleiðis, at bert er heimild til at veita studning til stovnanina av tí fyrstu tannlæknastovuni í deildini og ikki til at skifta út tól. Landsstýrið hevur ikki lagt seg út í spurningin um nýtslu tannlæknans av tannlæknastovuni til egin viðskiftafólk, men latið spurningin til kommunurnar.

Gongdin síðani 1958 hevur verið, at meginparturin av undirvísingarskyldugum børnum er komin undir regluliga tannarøkt, ikki tí sum víst á, at kommunurnar hava havt lógbundna skyldu á sær, men tær hava sjálvkravdar tikið hesa uppgávu upp á seg. Uttan iva hevur studningsskipanin tó havt positiva ávirkan.

Eftir viðlagda yvirliti (skjal 6) sæst, at tað bert eru Eiðis og Runavíkar læknadømi umframt kommunurnar Kollafjørður, Viðareiði, Hvannasund, Kunoy og Mikladalur, har eingin tilnevndur skúlatannlækni er. T.v.s., at pr. 1. januar 1981 vóru 6.067 undirvísingarskyldug børn undir sjálvbodnari skipan við tilnevndum skúlatannlækna. Tað eru tó kommunur, ið eru uttan fyri skipanina, sum tó hava avtalu (kommunurnar

í Runavíkar læknadømi og ymsar aðrar), ella sum endurgjalda foreldrum fyri skúlabarnatannarøkt hjá privatpraktiserandi tannlækna. Eisini hava hesar kommunur í Eiðis læknadømi: Eiði, Funningur, Gjógv og Sund ta skipan, at tannlækni um summarið viðger børn frá hesum kommunum á klinikk, sum Eiðis kommuna eigur. Eftir hesum mugu flestu undirvísingarskyldug børn vera undir tannarøkt.

*ad 2. Ortodontisk viðgerð*

Nevndin skilir setningin bert at umfata undirvísingarskyldug børn.

Ortodonti ella rætting av tannlegubrekum er sergrein á tannlæknaháskúlunum. Tannlækni er í Føroyum, ið hevur hesa sergreinina, men hevur hann onga avtalu við sjúkrakassa. Hann hevur heldur ikki avtalu við vanlukkuráðið, men má sjúklingurin sjálvur søkja um stuðul í hvørjum einstøkum føri.

Í vissan mun rætta skúlatannlæknarnir tannlegubrek. Í summum kommunum endurgjalda kommunurnar ein part av gjaldinum til sertannlækna, tá skúlatannlæknin vísir skúlabarni til sertannlækna til viðgerð av tannlegubreki, men er sertannlæknaviðgerðin í ongum føri ein integreraður partur av barnatannarøktini.

Um danska lógin verður sett í gildi í Føroyum, kemur rætting av tannlegubrekum undir tvungnu skipanina.

*ad 3. Tannarøktin av evnaveikum børnum á skúlanum á Trøðni og av sjúklingum á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum.*

Eftir skipanini í Danmark eru undirvísingarskyldug børn, ið hava tilhald á statsligum ella góðkendum døgnstovnum, undir skúlabarnatannarøktarskipanini í tí kommununi, har stovnurin er, uttan so at stovnurin sjálvur hevur tannlæknastovu. Stovnurin, um hann ikki hevur tannlæknastovu, endurrindar kommununi so mikið, sum svarar til meðalútreiðsluna fyri barn undir tannarøktarskipanini.

Skúlin á Trøðni er einasti serskúlin í landinum, sum tekur sær av undirvísingini av øllum brekaðum børnum í tann mun, fólkaskúlin ikki ger tað. Skúlin hevur ikki tannlæknastovu, men hevur avtalu við Tórshavnar kommunu um tannaviðgerð av undirvísingarskyldugum børnum móti at endurrinda kommununi árligu meðalútreiðsluna fyri barnið, sum í 1981 var um 1.100 kr. Torført hevur verið at praktisera avtaluna. Undir skipanina koma tó ikki evnaveik børn, tey verða viðgjørd

hjá teimum privat praktiserandi tannlæknunum, viðgerðin verður goldin av skúlanum. Børn við grovum talubrekum, opnum himli ella skarði í vørr verða fyri rokning skúlans viðgjørd hjá sertannlækna, sama er galdandi fyri børn við tannlegubrekum, hesi brek kunnu føra talubrek við sær. Viðvíkjandi teimum børnum, ið eru undir ella yvir undirvísingarskyldugan aldur, er tann serskipanin galdandi fyri hvønda skúla, at skúlin rindar tannaviðgerðina hjá privat praktiserandi tannlækna.

Tannaviðgerð av sjúklingum á psykiatriskari deild á Landssjúkrahúsinum og av evnaveikum á deildunum á Eirargarði, og sum ikki ganga á Skúlanum á Tróðni, fer, í tann mun tað letur seg gera, fram hjá privat praktiserandi tannlækna og verður goldin av tí almenna.

*ad 4. Støða nevndarinnar.*

Nevndin mælir til, at tað verður lógarfest, at kommunurnar hava skyldu at átaka sær og gjalda fyri tannaviðgerð av øllum undirvísingarskyldugum børnum og setir fram uppskot til kgl. fyriskipan samsvarandi hesum. Hin vegin heldur nevndin tað ikki vera beint í hesum umfarinum, at skyldan eisini kemur at umfata børn undir undirvísingarskyldugum aldri.

Um ortodontiska viðgerð førir Bogi á Steig fram, at tær størru donsku kommunurnar, ið fleiri hava líka stórt ella større fólkatal sum Føroyar, hava fleiri barnatannlæknastovur knýttar at teimum ymsu skúlunum, meðan hvør stórkommuna bert hevur eina serklinikk til ortodontiska viðgerð. At tað er so, kemst av, at hvør sertannlæknin verður hildin at kunna viðgera skeivleikar hjá børnum úr einum samlaðum skúlabarnaflokki uppá kanska 5.000, og eisini tí at henda viðgerðin krevur kostnaðarmiklari tilfar og útgerð enn ein vanlig tannlæknastova.

Nógv av hesum tannabrekum koma fyri hjá ávísum familjum ella í ávísum bygdum, og kemst tað av, at brekini ofta eru ættarbregðilig, og verða tey tí ein tung byrða hjá hesum familjum ella hjá hesum bygdum, um hesi skulu gjalda.

Bogi á Steig metir tí, at landsstýrið beinleiðis ella um heilsuverkið eigur at gjalda ortodontisku viðgerðina, og at settur verður tí ein sertannlækni í ortodonti at virka undir heilsuverkinum.

Dánjal Tausen tekur undir í tí, sum Bogi á Steig førir fram um, at landskassin ella sjúkrahúsverkið rindar ortodontisku viðgerðina, og vísir í hesum sambandi á, at á Skúlanum á Tróðni rinda kommunurnar ikki fyri tannaviðgerðina.

Viðvíkjandi stuðuli frá landskassanum til stovnan av tannlæknastovu verður mælt til, at skipanin her verður hin sama sum fyri bygging av læknamiðstøðum, t.v.s. 50% í studningi og 40% í láni úr landskassanum. Undantak verður tó, har tannlæknastova verður bygd sum ein integreraður partur av einum skúlabygningi; í slíkum førum er studningurin 50%, ella 30% frá landskassanum og 20% frá statinum. Viðvíkjandi víðkan av tannlæknastovum og til størri nútíðargerð, men ikki til umvælingar ella útskifting av tólum vegna slit, verður stuðulin sum frammanfyri, og eftir sum talan er um sjálvstøðugan bygning ella part av skúla. Eftir hesum kann lógin nr. 38 frá 11. juni 1958 setast úr gildi, samstundis sum árlig játtan verður sett á fíggjarløgtingslógina.

Nevndin við undantak av Dánjal Tausen heldur tað vera óheppið, at skúlatannlæknarnir samstundis eru privat praktiserandi, t.v.s. eisini nýta høli og tól á kommunalu tannlæknastovuni til privat viðskiftafólk. Meirilutin mælir tí til, at tannlæknaøkini verða skipað soleiðis, at hvør tannlæknin hevur so mong børn, eini 500, at hann er skúlabarnatannlækni burturav. Kommunala umboðið førir fram, at tað enn á mongum plássum er hepnasta loysnin, at tannlækni arbeiðir bæði við skúlabørnum og við vaksnum og í sama høli.

Um Skúlan á Trøðni er serstakliga at siga, at skilabesta loysnin á tannarøkt skúlans er, at gjørd verður tannlæknastova á skúlanum, síðan flutningur av næmingunum aðra staðir í býnum er torførur og krevjandi bæði viðvíkjandi starvsfólki og tíð. Eisini verður ført fram, at hesir næmingar eru serstakliga baugnir fyri at verða sendir til kanningar ella viðgerð uttan fyri skúlan, í hesum sambandi verður víst til, at skúlalæknin hevur stovu á skúlanum. Um klinikkin verður løgd á skúlanum, vil tannarøktin verða ein náttúrligur partur av arbeiði skúlans og hava størri tryggleika fyri næmingarnar við sær. Viðgerðin kann fremjast lættari í vanliga umhvørvi barnanna og í samarbeiði við lærarar og røktarstarvsfólk, ið kenna børnini. Starvsfólkið á tannlæknastovuni fær umframt størri kunnleika til einstøku næmingarnar og serstakligu støðu teirra at taka við í viðgerðini. Sum sera týdningarmikið í tilrættaleggingini og fremjingini av arbeiðinum í fyribyrging av tannasjúkum er, at tannlæknastovan er á skúlanum. Um so verður, er skúlans tørvur á tannlæknaligari tænastu lokin. Tó má havast í huga, at serviðgerðin eitt nú tannaregulering hjá børnum við opnum

himli ella skarð í vørr má fara fram í býnum hjá sertannlækna, men er har talan um fá børn.

Næmingatal skúlans, eini 150 børn, er ikki nóg stórt grundarlag at seta ein tannlækna burturav. Talan hevur tí verið um at seta ein tannlækna saman við Landssjúkrahúsinum at viðgera sjúklingar á psykiatriskari deild og búfólk á deildunum á Eirargarði. Samlaða talið verður tá um 350. Tá ið hugsað verður um, at hesir tannasjúklingarnir eru torførari at viðgera enn aðrir sjúklingar, verður tað hildið forsvarligt at seta ein tannlækna fyri báðar stovnar, tó soleiðis at ein tannlæknastova er á skúlanum og ein á sjúkrahúsinum. Høli eru tøk á báðum stovnum.

*ad 5.* Samanumtikið verður mælt til:

**a.** Viðlagda uppskot til kongaliga fyriskipan um sambært §9 í lóg nr. 217 frá 19. mai 1971 »om børnetandpleje« at seta lógina í gildi fyri Føroyar verður framt.

**b.** Viðlagda uppskot til kunngerð »om børnetandpleje« verður sett í gildi fyri Føroyar.

**c.** Nýstovnaðar kommunalar tannlæknastovur fáa stuðul frá landskassanum eftir somu reglum sum læknamiðstøðir. Tó fáa tannlæknastovur, ið verða bygdar sum integreraður partur av skúlabygningi studning eftir somu reglum sum fólkaskúlabygging. Til víðkan av tannlæknastovu og til umfatandi nútíðargerð av verandi tannlæknastovum, men ikki til umvælingar ella útskifting av slitnum lutum o.t. verður stuðul latin eftir reglunum frammanfyri alt eftir, um talan er um bygging uttan fyri skúlabygning ella bygging sum integreraður partur av skúlabygningi.

Játtan verður at seta á fíggjarlógina.

**d.** Løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 um tannlæknaskipan verður sett úr gildi.

**e.** Settur verður ein tannlækni við virkisøkinum at viðgera næmingarnar á Skúlanum á Trøðni og sjúklingarnar á psykiatrisku deildini á Landssjúkrahúsinum og búfólkini á Eirargarði, og soleiðis at tannlæknin hevur eina tannlæknastovu á skúlanum og eina á sjúkrahúsinum.

Frá *Boga á Steig og Dánjal Tausen:* Settur verður undir heilsuverkinum sertannlækni í ortodonti.

Harafturat mælir *Bogi á Steig* til at strika 2. og 3. stk. í §7 í »anordning«. Hann grundgevur hesa støðu, at so gott sum

allar kommunur, har eingin reglulig skipan er um barnatannarøkt, í dag gjalda fyri viðgerð hjá privat praktiserandi tannlækna, tá børnini fáa viðgerð, viðgerðin er sjálvandi ikki so reglulig.

Hann heldur tí, at stykkini kunnu strikast, uttan at nøkur kommuna verður fíggjarliga ov hart rakt.

Hesi skjøl eru viðløgd:

1. Uppskot til Anordning om ikrafttrædden for Færøerne af lov om børnetandpleje.
2. Uppskot til Indenrigsministeriets bekendtgørelse nr. af om børnetandpleje.
3. Lóg nr. 217 frá 19. mai 1971 »om børnetandpleje«.
4. Kunngerð frá innanríkismálaráðnum nr. 347 frá 8. juli 1971 »om børnetandpleje«.
5. Løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 um tannlæknaskipan.
6. Yvirlit yvir tannrøkt av undirvísingarskyldugum børnum.
7. Skriv frá Føroya Tannlæknafelag dagfest 16. juli 1975.
8. Reglur fyri setan av barnatannlæknum.
9. Uppskot til skipan av miðvísari ortodontiskari viðgerð í Føroyum.

Í juni mánaði 1982

Johan Djurhuus (sign.)
Sigvald Kristiansen (sign.)
Bogi á Steig (sign.)
Dánjal Tausen (sign.)

**Skjal 11C**

# Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om børnetandpleje

I medfør af §9 i lov nr. 217 af 19. maj 1971 om børnetandpleje bestemmes, at loven, som den er ændret, træder i kraft på Færøerne i følgende skikkelse:

**§1.** Kommunerne indretter klinikker og ansætter tandlæger og hjælpepersonale i det omfang, det er nødvendigt for at sikre alle børn i den undervisningspligtige alder adgang til vederlagsfri forebyggende og behandlende tandpleje.

**§2.** Landsstyret kan, når særlige forhold taler derfor, godkende, at en kommune opfylder sin forpligtelse til at gennemføre den i §1 omhandlede vederlagsfrie tandpleje ved aftaler med privat praktiserende tandlæger og ved anvendelse af disses klinikker.

*Stk. 2.* Landsstyrets godkendelse efter stk. 1 forudsætter, at såvel den forebyggende som den behandlende børnetandpleje udføres lige så betryggende som i kommuner med kommunal børnetandpleje, jfr. §1.

**§3.** Landsstyret kan træffe afgørelse om hvilke kommuner, der sammen skal etablere en fælles børnetandplejeordning. Ligeledes kan landsstyret fastsætte reglerne for et sådant fællesskab.

*Stk. 2.* Ændring eller ophævelse af de nævnte fællesskaber kræver landsstyrets godkendelse.

**§4.** Regler om omfanget af og kravene til den af loven omfattede børnetandpleje fastsættes af indenrigsministeren efter forhandling med landsstyret.

**§5.** Retningslinjer for de kommunale børnetandplejeklinikkers indretning og drift fastsættes af sundhedsstyrelsen.

**§6.** Kommunalbestyrelser er forpligtet til efter regler fastsat af sundhedsstyrelsen at afgive oplysninger om virksomheden i medfør af denne lov.

**§7.** Anordningen træder i kraft den 1. august 198..

*Stk. 2.* Indtil den 1. august 198.. omfatter pligten efter § 1 kun børn i første skoleår og hjemmeunderviste børn på samme alderstrin. Indtil den 1. august 198.. omfatter pligten børn i første og andet skoleår og hjemmeunderviste børn på samme alderstrin og så fremdeles, indtil ordningen omfatter alle børn i den undervisningspligtige alder.

*Stk. 3.* Uanset bestemmelsen i stk. 2 kan landsstyret dog pålægge kommunalbestyrelser at gennemføre rimelige foranstaltninger til forebyggelse af tandsygdomme hos børn.

**§8.** Forslag om revision af anordningen fremsættes for lagtinget senest i lagtingssamlingen.

*Viðmerking:*
Bogi á Steig vil hava, at §7, 2. og 3. stk. verður strikað.

**Skjal 11D**

# Indenrigsministeriets bekendtgørelse nr. .... af ..... om børnetandpleje

I henhold til §4 i kongelig anordning nr. .... af ..... om børnetandpleje fastsættes:

**§1.** Den vederlagsfri forebyggende og behandlende tandpleje skal omfatte alle undervisningspligtige børn, som har bopæl i kommunen, jfr. dog anordningens §7, stk. 2.

*Stk. 2.* Børn, der har ophold på statslige eller anerkendte døgninstitutioner, skal være omfattet af børnetandplejeordningen i den kommune, hvor institutionen er beliggende, medmindre institutionen har indrettet klinik. Institutionen betaler til kommunen et beløb svarende til kommunens gennemsnitlige udgift pr. barn i børnetandplejeordningen.

*Stk. 3.* Kommunalbestyrelsen træffer aftale om refusion af de udgifter, behandlende kommune afholder for et barn, der får en af loven omfattet vederlagsfri tandpleje uden for kommunen.

**§2.** Deltagelse i den kommunale børnetandpleje er frivillig. Frameldelse eller senere udmeldelse af et barn skal foretages skriftligt af forældremyndighedens indehaver til børnetandplejens leder, der underretter kommunalbestyrelsen.

**§3.** Den kommunale børnetandpleje skal omfatte:

1. Almene forebyggende foranstaltninger, herunder oplysningsvirksomhed m.v., som må anses for påkrævede og praktisk gennemførlige i det pågældende område.
2. Individuelle forebyggende foranstaltninger, herunder oplysning af det enkelte barn og dets forældre og instruktion i tandpleje for det enkelte barn.
3. Regelmæssige tandlægelige undersøgelser af tandsystemets udvikling og sundhedstilstand.
4. Tandlægelig behandling af tandsygdomme og tandstillingsfejl i det omfang, bevarelsen af tandsystemet i god funktionsdygtig stand kræver det.

§4 Kommunalbestyrelsen udarbejder på grundlag af sundhedsstyrelsens i medfør af lovens §5 udsendte retningslinier forslag til indretning af nye og udvidelse og ombygning af bestående tandklinikker. Skitseprojekter godkendes af landsstyret.

§5. Kommunalbestyrelsen ansætter leder, tandlæger og hjælpepersonale ved den kommunale børnetandpleje. Stillingen som konsulent i børnetandpleje besættes om nødvendigt af landsstyret.

*Stk. 2.* Ledere af kommunale børnetandplejeklinikker skal gennemgå kurser i socialodontologi, herunder offentlig hygiejne, medicinallovgivning og administration, oprettet eller godkendt af sundhedsstyrelsen.

*Stk. 3.* Sundhedsstyrelsen kan gøre undtagelse fra bestemmelsen i stk. 2.

§6. Denne bekendtgørelses regler for de enkelte kommuner finder tilsvarende anvendelse på børnetandplejeordninger, der omfatter flere kommuner.

§7. Bekendtgørelsen træder i kraft den 1. august 198..

*Viðmerkingar:*
Bogi á Steig og Dánjal Tausen vilja hava, at ortodontiska viðgerðin, jbr. §3, punkt 4 verður løgd undir sertannlækna í ortodonti, settur undir og goldin av heilsuverkinum.

Skjal 11E

# Lov nr. 217 af 19. maj 1971 om børnetandpleje

**§1.** Kommunerne indretter klinikker og ansætter tandlæger og hjælpepersonale i det omfang, det er nødvendigt for at sikre alle børn i den undervisningspligtige alder adgang til vederlagsfri forebyggende og behandlende tandpleje.

*Stk. 2.* Den kommunale børnetandpleje forvaltes efter reglerne i lov om styrelse af sociale og visse sundhedsmæssige anliggender.

**§2.** Amtsrådet kan, når særlige forhold taler derfor, i en tidsbegrænset periode fritage en kommune for pligten efter §1. Kommunen skal i så fald afholde udgifterne ved børnenes tandpleje hos privat praktiserende tandlæger.

**§3.** Amtsrådet kan godkende overenskomster mellem to eller flere kommuner om etablering af fælles børnetandplejeordninger.

*Stk. 2.* Ændring i eller ophævelse af et sådant fællesskab kræver amtsrådets godkendelse.

**§4.** Regler om omfanget af og kravene til den af loven omfattede børnetandpleje fastsættes af indenrigsministeren efter forhandling med Kommunernes Landsforening, Københavns og Frederiksberg kommunalbestyrelser og Amtsrådsforeningen i Danmark.

**§5.** Retningslinjer for de kommunale børnetandplejeklinikkers indretning og drift fastsættes af sundhedsstyrelsen.

**§6.** Kommunalbestyrelser og amtsråd er forpligtet til efter regler fastsat af sundhedsstyrelsen at afgive oplysninger om virksomheden i medfør af denne lov.

*Stk. 2.* En årlig beretning over kommunernes og amtskommunernes virksomhed på børne

tandplejeområdet indsendes til indenrigsministeriet af amtsrådene, Københavns og Frederiksberg kommunalbestyrelser.

*Stk. 3.* Amtsrådene udarbejder ved forhandling med de kommunale myndigheder en plan for udbygningen af børnetandplejevirksomheden i amtet. Tilsvarende planer udarbejdes af Københavns og Frederiksberg kommunalbestyrelser. Planerne, der skal godkendes af indenrigsministeren, optages til revision med højst 5 års mellemrum.

**§ 7.** Loven træder i kraft den 1. august 1972.

*Stk. 2.* Indtil den 1. august 1973 omfatter pligten efter § 1 kun børn i første skoleår og hjemmeunderviste børn på samme alderstrin. Indtil den 1. august 1974 omfatter pligten børn i første og andet skoleår og hjemmeunderviste børn på samme alderstrin og så fremdeles, indtil ordningen omfatter alle børn i den undervisningspligtige alder.

*Stk. 3.* Uanset bestemmelsen i stk. 2. kan indenrigsministeren dog pålægge kommunalbestyrelser og amtsråd at gennemføre rimelige foranstaltninger til forebyggelse af tandsygdomme hos børn.

**§ 8.** Forslag om revision af loven fremsættes for folketinget senest i folketingsåret 1977-78.

**§ 9.** Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kgl. anordning sættes i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger.

Skjal 11F

# Indenrigsministeriets bekendtgørelse nr. 347 af 8. juli 1971 om børnetandpleje

I henhold til §4 i lov nr. 217 af 19. maj 1971 om børnetandpleje fastsættes:

**§1.** Den vederlagsfri forebyggende og behandlende tandpleje skal omfatte alle undervisningspligtige børn, som har bopæl i kommunenen, jfr. dog lovens §7, stk. 2.

*Stk. 2.* Børn, der har ophold på statslige eller anerkendte døgninstitutioner, skal være omfattet af børnetandplejeordningen i den kommune, hvor institutionen er beliggende, medmindre institutionen har indrettet klinik. Institutionen betaler til kommunen et beløb pr. barn svarende til kommunens gennemsnitlige udgift pr. barn i børnetandplejeordningen.

*Stk 3.* Kommunalbestyrelserne træffer aftaler om refusion af de udgifter, som en behandlende kommune afholder for et barn, der får en af loven omfattet vederlagsfri tandpleje udenfor sin bopælskommune.

**§2.** Deltagelse i den kommunale børnetandpleje er frivillig. Frameldelse eller senere udmeldelse af et barn skal foretages skriftligt af forældremyndighedens indehaver til børnetandplejens leder, der underretter det sociale udvalg.

**§3.** Den kommunale børnetandpleje skal omfatte:

1. Almene forebyggende foranstaltninger, herunder oplysningsvirksomhed m.v., som må anses for påkrævede og praktisk gennemførlige i det pågældende område.
2. Individuelle forebyggende foranstaltninger, herunder oplysning af det enkelte barn og dets forældre, og instruktion i tandpleje for det enkelte barn.
3. Regelmæssige tandlægelige undersøgelser af tandsyste-

mets udvikling og sundhedstilstand.
4. Tandlægelig behandling af tandsygdomme og tandstillingsfejl i det omfang, bevarelsen af tandsystemet i god funktionsdygtig stand kræver det.

§4. Kommunalbestyrelsen udarbejder på grundlag af sundhedsstyrelsens i medfør af lovens §5 udsendte retningslinier forslag til indretning af nye og udvidelse og ombygning af bestående tandklinikker. Skitseprojekter godkendes af amtsrådet, der påser, at projektet er i overensstemmelse med den for amtsrådskredsen godkendte udbygningsplan, jfr. lovens §6, stk. 3.

*Stk. 2.* Projekter til tandklinikbyggeri i Københavns og Frederiksberg kommuner skal være i overensstemmelse med de af indenrigsministeriet godkendte udbygningsplaner for disse kommuner.

§5. Kommunalbestyrelsen ansætter leder, tandlæger og hjælpepersonale ved den kommunale børnetandpleje. Stillinger som amtskonsulent i børnetandpleje besættes af amtsrådet.

*Stk. 2.* Ledere af kommunale børnetandplejeklinikker og amtskonsulenter i børnetandpleje skal gennemgå kurser i socialodontologi, herunder offentlig hygiejne, medicinallovgivning og administration, oprettet eller godkendt af sundhedsstyrelsen.

*Stk. 3.* Sundhedsstyrelsen kan gøre undtagelse fra bestemmelsen i stk. 2.

§6. Inden den 1. oktober hvert år indsendes den i lovens §6, stk. 2, omhandlede beretning til indenrigsministeriet. Beretningen følger skoleåret.

*Stk. 2.* Den i lovens §6, stk. 3, omhandlede plan forelægges første gang for indenrigsministeriet senest den 1. oktober 1973.

§7. Denne bekendtgørelses regler for de enkelte kommuner finder tilsvarende anvendelse på børnetandplejeordninger, der omfatter flere kommuner.

§8. Bekendtgørelsen træder i kraft den 1. august 1972.

**Yvirlit yvir, hvussu reglulig skúlabarnatannarøkt við tilnevndum skúlatannlækna er skipað í teimum ymsu læknadømunum pr. 31. december 1981.**

**Skjal 11 G**

| | Suður-oyar sunnara | Suður-oyar norðara | Sandoy | Vágoy | Vest-manna | Suður-streym-oy | Skála | Fugla-fjørður | Runa-vík | Eiði | Norð-oyggjar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Røktin byrjað | 1962 | 1963 | 1972 | 1959 | 1968 | 1959 | 1972 | 1973 | ÷ | ÷ | 1965 |
| Hvørjar aldursbólkar | 1.-8. fl. 7-15 ár | 4. ár-10. fl. 4-16 ár | 1.-7. fl. 7-14 ár | 0-7. fl. 6-14 ár | 0-10. fl. 6-16 ár | 1.-9. fl. 7-15 ár | 1.-7. fl. 7-14 ár | 1.-7. fl. 7-14 ár | ÷ | ÷ | 1.-10. fl. 7-16 ár |
| Hvørjar kommunur eru ikki við | 0 | 0 | 0 | Sanda-vágur | Kolla-fjørður | 0 | 0 | 0 | ÷ | ÷ | Viðareiði Hvannasund Kunoy Mikladalur |
| Talið av børnum undir skiparini | 404 | 670 | 223 | 340 | 360 | 2450 | 351 | 354 | ÷ | ÷ | 915 |
| Talið av børnum uttan fyri skiparina (7-14 ár) | 0 | 0 | 0 | 116 | 112 | 0 | 0 | 0 | 518 | 286 | 123 |
| Samlaða fólkatalið | 2782 | 3104 | 1760 | 2880 | 2588 | 14516 | 2473 | 2689 | 3259 | 2166 | 5853 |
| Hvar er klinikkin | Vági | Tvøroyri | Sandi | Sørvági | Vest-manna | Tórs-havn | Skála og Gøtu | Fuglaf. og Lorvík | ÷ | ÷ | Klaksvík |
| Hvør eigur klinikkina | Vágur | Allar kommunur | Allar kommunur | Sør-vágur | Vest-manna | Tórs-havn | Skála og Gøtu | Fuglaf. og Lorvík | ÷ | ÷ | Klaksvík |

| Hvør setir tannlækna | Vágur | Allar kommunur | Allar kommunur | Sør-vágur | Vest-manna | Tórs-havn | Allar kommunur | Fuglaf. og Lorvik | ÷ | ÷ | Klaksvík |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðstíð tannlæknans | 2/3 | 2 hálvir | 1/2 | 2/3 | 2/3 | 4 heilir | 2/3 | 2/3 | ÷ | ÷ | 2 heilir |

Hvussu verða útreiðslurnar býttar: Tá fíggjarárið er uppgjørt, verður gjaldið fyri hvørt barnið roknað, og skal so hvør kommuna gjalda út frá sínum barnatali.

**Skjal 11H**

Føroya Tannlæknafelag
v/Hr. Erling Johannesen
Marknagilsvegur
3800 Tórshavn

Fuglafjørður, tann 16. juli 1975

Til Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

Føroya Tannlæknafelag loyvir sær við hesari frágreiðing um skúlabarnatannarøktina í Føroyar at heita á Føroya Landsstýri um at skipa fyri einari endurskoðan av løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958.

Vit skulu her royna at siga frá, hvussu barnatannlæknaskipanin er í løtuni:

I Teir tannlæknar, sum eru settir nú, eru settir eftir vanligari lýsing í »Tandlægebladet«. Tilnevning og lønarlag eru sambært »Aftale og overenskomst mellem Kommunernes Landsforening og Dansk Tandlæge Forening« frá 8. juni 1971.

Tannlæknarnir í Føroyum eru limir í Dansk Tandlægeforening og hoyra til »Sjællands Tandlægeforening« (2. kreds). Tannlæknarnir hava innan henda »kreds« sítt egna felag (Føroya Tannlæknafelag), sum hevur avtalu og samráðingarrætt við føroyskar myndugleikar.

II Niðanfyri verður greitt frá, hvussu tannarøktin er skipað í teimum læknadømunum, har skúlatannlæknar eru:

*Suðuroyar Sunnara Læknadømi:*
Tannrøkt stovnsett 1962.
Allar kommunurnar eru saman um tannlæknastovuna.
Tannlæknin er settur av Vágs kommunu.
Arbeiðstíðin er 2/3 av heiltíð (2/3 av 1440 tímum árliga).
Øll børn frá 7 til 14 ár í læknadømunum fáa viðgerð.
Avrokningarskipanin ikki upplýst.

Barnatalið er 317.
Fólkatalið er 2.610.

*Suðuroyar Norðara læknadømi:*
Tannlæknastova kom 1963. Allar kommunurnar eiga klinikkina. Tvøroyrar kommuna tekur sær av rakstrinum og avroknar við hinar eftir fólkatalinum.
Tveir tannlæknar settir — 1 klinikksjefur, helvt av heiltíð, 1 barnatannlækni, helvt av heiltíð.
Settir av
Øll børn í eindini fáa viðgerð.
Barnatalið frá 7 til 14 ár er 435 (tannrøktin umfatar eisini børnini í 8., 9., 10., 1., 2. og 3. real, og eru hesi 105 í tali).
Fólkatalið er 2.935.

*Sandoyar Læknadømi:*
Skúlasambandið eigur og rekur tannlæknastovuna.
Fastur tannlækni settur 1972. Arbeiðir helvt av heiltíð.
Útreiðslurnar verða býttar millum kommunurnar eftir barnatalinum 7 til 14 ár.
Øll børn frá 7 til 14 ár fáa viðgerð uttan Skúvoyar børn (Skúvoyar kommuna er ikki við í skúlasambandinum).
Barnatalið er 275.
Fólkatalið er 1.700.

*Vága Læknadømi:*
Sørvágur eigur tanlæknastovuna, ið var sett á stovn 1959.
Tannlæknin er settur av »Felagskommununi«.
Sørvágs kommuna tekur sær av rakstrinum, verður nú býtt ímillum kommunurnar, men í løtuni er eingin skipan viðvíkjandi útreiðslubýtinum.
Tannlæknin arbeiðir 2/3 av heiltíð.
Øll børn frá 7 til 14 ár fáa viðgerð.
Barnatalið er 360.
Fólkatalið er 2.680.

*Vestmanna Læknadømi:*
Vestmanna kommuna eigur tannlæknastovuna.
Tannlæknin settur í fast starv 1968 av Vestmanna kommunu.
Útreiðslurnar verða býttar eftir barnatalinum. Útgoldið verður frá Vestmanna kommunu og Kollafjarðar kommunu hvør sær

Tannlæknin arbeiðir helvt av heiltíð í Vestmanna og fjórðing av heiltíð í Kollafirði.
Øll børn frá 7 til 14 ár fáa viðgerð.
Barnatalið er 380.
Fólkatalið er 2.260.

*Suðurstreymoyar Læknadømi:*
Tórshavnar kommuna eigur tannlæknastovuna og tekur sær av rakstrinum.
Útreiðslurnar verða býttar eftir barnatalinum í kommununum.
Tannlækni settur í fast starv 1959. Nú arbeiða 2 tannlæknar í heiltíðarstarvi og ein 2/3 av heiltíð.
Øll børn í læknadømunum frá 7 til 14 ár fáa viðgerð.
Barnatalið er 2.000.
Fólkatalið er: Tórshavnar uttanbíggjar kommuna 1.865.
Tórshavnar kommuna 12.250.

*Skála Læknadømi:*
Tannlæknin settur 1972 av øllum kommunum í felag. Arbeiðstíðin er 2/3 av heiltíð.
Fyribils klinikk við Gøtugjógv. Eigari er Gøtu kommuna.
Tannlæknin fær útgoldið løn frá hvørjari kommunu sær eftir barnatalinum frá 7. til 14 ár.
Aðrar útreiðslur tekur Skála kommuna sær av og millumroknar við hinar eftir barnatalinum.
Barnatalið er 400.
Fólkatalið er 2.390.

*Fuglafjarðar Læknadømi:*
Tannlæknastovur í Leirvík (1966) og Fuglafirði (1969), sum kommununurnar eiga hvør sær.
Tannlækni settur í fast starv 1973 av kommununum í felag. Arbeiðstíðin er 2/3 av heiltíð.
Fuglafjarðar kommuna tekur sær av rakstrinum og avroknar við hina eftir barnatalinum frá 7 til 14 ár.
Øll børn frá 7 til 14 ár fáa viðgerð.
Barnatalið er 330.
Fólkatalið er 2.255.

*Runavíkar Læknadømi:*
Eingin reglulig barnatannarøkt.
Talið á skúlabørnum frá 7 til 14 ár er 440.
Fólkatalið er 2.820.

*Eiðis Læknadømi:*
Eingin reglulig barnatannarøkt.
Talið á skúlabørnum frá 7 til 14 ár er 290.
Fólkatalið er 1.975.

*Norðoya Læknadømi:*
Klaksvíkar kommuna eigur tannlæknastovuna, og einans børn úr Klaksvíkar kommunu verða viðgjørd.
Fastur tannlækni settur 1965.
Barnatalið frá 7 til 14 ár er 700.
Um 100 onnur børn í læknadømunum fáa ikki regluliga viðgerð.
Fólkatalið er: Klaksvíkar kommuna 4.590.
Í hinum kommununum tilsamans 1.075.

Sum tað sæst, er reglulig tannarøkt av skúlabørnum rættuliga ung í Føroyum.

Eisini sæst, at 9 av 11 læknadømum nú hava fasta barnatannlæknaskipan, men at rættuliga stór frávik eru, hvussu kommunurnar samarbeiða. Bæði viðvíkjandi ognarviðurskiftum av tannlæknastovum og rakstrinum av teimum.
Klinikstjórarnir eru heldur ikki settir á sama hátt. Ikki eru heldur øll børm í skúlaaldri við í regluligu tannarøktini í onkrum av læknadømunum.

Av frágreiðingini framgongur, at 85% av børnunum í skúlaaldri eru komin undir regluliga tannarøkt.

Eisini framgongur, at tannlæknar bert eru settir í heiltíðarstarv í Tórshavn og Klaksvík.

Har tannlæknin ikki er settur í heiltíðarstarv, fer privatarbeiði fram á teimum kommunalu tannlæknastovunum.

Fólkatingslóg nr. 217 frá 11. mai 1971 áleggur donsku kommununum at seta á stovn kommunalar tannlæknastovur, har øll børn í skúlaaldri kunnu fáa fyribyrgjandi og viðgerandi tannarøkt. Lógin er ikki galdandi fyri Føroyar, men kann við kongaligari fyriskipan setast í gildi her. Ríkisumboðið sendi lógina til landslæknan til umsagnar.

Landslæknin hevur biðið Føroya Tannlæknafelag um sína metan

av, um lógin átti at verðið sett í gildi í Føroyum.

Felagnum er heilt greitt, at neyðugt er við lóggávu fyri barnatannarøktina.

Í svari okkara til landslæknan mæltu vit kortini frá at seta donsku lógina í gildi í Føroyum.

Halda vit, at heldur eigur at verða bygt víðari í løgtingslóg nr. 38 frá 11. juni 1958 og annars á tann framburð, ið verið hevur hesi seinastu árini.

Áðrenn 1958 var eingin settur skúlatannlækni í Føroyum. Lógin frá sama ári hevur havt sín stóra lut í framburðinum, sum verið hevur síðani tá.

Nú má tíðin vera komin til at endurskoða og útbyggja lógina.

Løgtingslóg nr. 38 sigur, at landsstýrið virkar fyri semju millum kommunurnar í læknadømunum um stovnsetan og rakstur av tannlæknastovunum.

Henda regla hevur ikki verið fylgd. Og tí hava umsitingarligir trupulleikar tikið seg upp, sum sloppið hevði verið undan, um tað kommunala samarbeiði lá í heilt fastari legu. Soleiðis at allar kommunurnar í eindini eiga tannlæknastovuna, reka hana og seta tannlæknan í felag.

Lógin eigur týðiliga at siga, at tannarøktin skal vera reglulig, fyribyrgjandi og viðgerandi. At samsvar er millum barnatal í eindini og talið av barnatannlæknum (sí viðmerkingar til donsku lógina). At tannlæknastovurnar, rúm, tól o.a. lúka ásettar treytir.

Fyri løgtingið er lagt »álit viðvíkjandi kommunulæknaskipanini o.m. í Føroyum«, har millum annað er talan um nýbýti av læknadømunum.

Okkum tykir, at núverandi býti hóskar best til tannlæknaskipan; tí við hesum býtiseindum síggja vit møguleika fyri at útbyggja soleiðis, at barnatalið (ikki bert í skúlaaldri) skapar grundarlag fyri at seta tannlæknan í heiltíðarstarv (samanber overenskomst mellem Kommunernes Landsforening og Dansk Tandlægeforening).

Ein av høvuðsstuðlunum undir útbyggingini av skúlabarnatannarøktini er studningurin, sum landsstýrið hevur latið til stovnsetan av skúlatannlæknastovum.

Vit mæla til at varðveita hesa studningsskipan og meta, at hon eisini skal taka við neyðugar endurnýggingar og útbyggingar. Studningur eigur ikki at verða latin, uttan so at áður nevndu treytir verða lúkaðar.

Landsstýrið kemur við hesum at stýra tí regluligu barnatannarøktini og fer tí at hava tørv á sakkønari hjálp.

Tannlæknafelagið átekur sær til eina og hvørja tíð at hava sakkønan mann tøkan.

Vit hava við hesari frágreiðing í stuttum greitt frá núverandi barnatannlæknaskipan og eftir førimuni víst á, hvussu bøtast kann uni.

Vit eru fegnir til taks fyri landsstýrinum — at geva gjølligari munnliga frágreiðing.

Tórshavn, 18. juni 1976

Erling Johannessen

Keldur: Klinikkstjórarnir
Årsberetning 1975 (Rigsombudsmanden på Færøerne)
Álmanakki 1975 (p/f H.N. Jacobsens Bókahandil)

Landsfólkayvirlitið
o.a.

**Skjal 11 I**

# Reglur fyri setan av barnatannlæknum

§1. Tilnevning og lønarlag eru sambært »Aftale og overenskomst mellem Kommunernes Landsforening og Dansk Tandlægeforening« fra 8. juni 1971. Er klinikkstjóri lutvíst settur, ella fer sjálvstøðugt arbeiði fram á barnatannlæknastovu, taka niðanfyri standandi reglur við.

§2. Fyrsti tannlækni í hvørjum núverandi læknadømi verður settur sum klinikkstjóri. Verða fleiri barnatannlæknar, skal klinikkstjórin setast í heiltíðarstarv.

§3. Talið á tanlæknum og lønarkrøv í mun til barnatalið.
Stk. 1.

| | Barnatal | Tannlæknatal | Lønarlag (lágmark) |
|---|---|---|---|
| A. | 0-300 | 1 | 1/2 av heiltíð |
| B. | 300-400 | 1 | 2/3 av heiltíð |
| C. | 400-600 | 1 | 1/1 av heiltíð |

Stk. 2. Tannlæknar umrøddir í stk. 1 hava rætt at røkja sjálvstøðugt starv á barnatannlæknastovuni uttan fyri ta tíð, ið er løgd av til barnatannarøkt. Hesin rættur fevnir bert um fyrstsetta tannlækna í hvørjum núverandi læknadømi.

Stk. 3. Lækkar barnatalið frá eini býtiscind niður í næstu, standa lønarkrøvini við, og tannlæknar, sum eru, kunnu vera sitandi, um teir vilja. Kommunur hava rætt til at taka børn niður til 3 ár og upp til 16 ár við undir ta kommunalu tannarøktina.

§4. Stk. 1. Í núverandi læknadømum, har sjálvstøðugt starvandi tannlæknar sita frammanundan, má ikki sjálvstøðugt arbeiði fara fram á barnatannlæknastovum.

Stk. 2. Setur sjálvstøðugt starvandi tannlækni seg niður í

læknadømi, har sjálvstøðugt arbeiði fer fram á barnatannlæknastovu, skal barnatannlæknin setast í heiltíðarstarv, um talið av børnum í aldrinum 3-16 ár gevur grundarlag fyri hesum. Barnatannlæknin í heiltíðarstarvi missir nú rættin til sjálvstøðugt arbeiði á barnatannlæknastovuni.

§5. Ongin tannlækni má røkja sjálvstøðugt arbeiði meira enn á einum stað. Viðgerð av songjarliggjandi sjúklingum er tó undantikin.

§6. Barnatannlækni má ikki seta tannlækna at hjálpa sær við tí sjálvstøðuga arbeiðinum á barnatannlæknastovuni.

§7. Kommunan fær til vega íbúð til tannlæknan. Sethúsaleigan má ikki fara upp um ta, sum vanlig er á staðnum. Húsini mugu vera av tíðarhóskandi stødd og dygd og hava tíðarhóskandi fast innbúgv.

§8. Viðvíkjandi rakstri og innrættan av barnatannlæknastovum samanber lógina um tvungna barnatannarøkt.

§9. Samstundis við, at hesar reglur verða settar í gildi, verður »Fráboðan frá F.T.O. frá 22. nov. 1964« tikin aftur.

Føroya Tannlæknafelag
Tórshavn á Mikkjalsmessu 1975

**Skjal 11J**

# Viðmerkingar til »Reglur fyri setan av Barnatannlæknum«

Sáttmálin, ið tannlæknar verða settir eftir: »Aftale og overenskomst mellem Kommunernes Landsforening og Dansk Tandlægeforening«, ásetur, at klinikkstjórin verður settur í heiltíðarstarv. Hesum er gjørt frávik í »Reglur fyri setan av barnatannlæknum« soleiðis, at kommunurnar fáa loyvi at seta klinikkstjóra í starv niður til 1/2 av heiltíðarstarvi,um barnatalið er lítið.

Sáttmálin ásetur somuleiðis, at sjálvstøðugt arbeiði má ikki fara fram á kommunalari tannlæknastovu. Eisini í hesum er gjørt frávik smb. »Reglur fyri setan av barnatannlæknum« soleiðis, at onnur enn børnini kunnu fáa tannarøkt.

Ein møgulcikin, sum kommunan hevur fyri at fáa tannlækna at koma til staðið til viðgerð av vaksnum í sjálvstøðugum starvi, er tann, at kommunan kann seta pengar í eina tannlæknastovu og síðan lata tannlæknan yvirtaka avdrátt og rentur. Men kommunan má tryggja tannlæknan soleiðis, at hon til eina og hvørja tíð er til reiðar at yvirtaka tannlæknastovuna aftur, um tannlæknin ynskir tað.

**Skjal 11K**

# Sáttmáli um útleigan av kommunalari tannlæknastovu

1. Klinikkstjórin hevur rætt til at leiga tannlæknastovu til sjálvstøðugt virki uttan fyri ta tíð, hon verður nýtt til barnatannarøkt smb. »Reglur fyri setan av barnatannlæknum« dagfest 29. sept. 1973.

2. Fyri tannlæknastovuna letur tannlæknin eina leigu upp á kr. 4.000,00 um árið, um tannlæknin arbeiðir hálvan dag í almennari tænastu, og kr. 3.000,00, um hann arbeiðir 2/3 dag, og kr. 1.500,00, um hann arbeiðir heilan dag. Hesar upphæddir verða at hækka ella lækka við 5% fyri hvørji 41 stig, sum prístalið fer upp ella niður. Hækkingin ella lækkingin fer fram 1. okt. við prístalinum 1. juli sum grundarlagi.

3. Tað tilfar, ið tannlæknin nýtir í egnum virki, skal hann gjalda sjálvur.

Av tilfari, sum neyðturviliga má koma í bland, sum serviettum, gipsi, sementi, amalgami, metir tannlæknin eftir bestu sannføring, hvussu stórur hansara og kommununnar partur er.

4. Tannlæknin skal sjálvur gjalda hjálparfólki í egnum virki.

Útreiðslur til rakstur sum vask, ljós, varma og umvælingar ber kommunan einsamøll. Av telefonini ber kommunan tær føstu útreiðslurnar, meðan tannlæknin ber útreiðslurnar fyri sínar egnu samtalur (uttanlands samtalur o.til.).

Føroya Tannlæknafelag
Tórshavn 21. januar 1974

**Skjal 11L**

# Uppskot til skipan av miðvísari ortodontiskari viðgerð í Føroyum

1. Landið styðjar við hesum tiltaki kommununum, sum hvørjar sær eru ov smáar bæði búskaparliga og viðvíkjandi barnatali til miðvísa ortodontiska tænastu.
2. *Endamálið* við skipanini er: í stigum at byggja eina fakligt og búskaparligt forsvarliga ortodontiska skipan fyri alt landið, við sama tilboði til øll skúlabørn uttan mun til bústað ella fíggjarstøðu foreldranna. Hetta lagað eftir búskapi landsins og tí manningartilfari, ið finst.
3. Skipanin er ætlað at *umfata* øll skúlabørn í landinum, sum áður nevnt uttan mun til bústað og fíggjarviðurskiftir, men treytað av, at barnið er undir regluligari almennari fyribyrgjandi og viðgerandi tannarøkt, ella í aðrar mátar fær regluliga tannarøkt.
4. Lagað eftir búskapar- og manningarorku verður *prioriteringin* viðvíkjandi tilboðum um viðgerð hendan tey fyrstu 2-3 árini:
   1. Verulig funktionel og morfologisk frávik hjá børnum í eldru flokkunum, t.e. 6., 7. og 8. flokki. Hetta er neyðhjálp fyri hesi børn.
   2. Børn úr 5. flokki, somuleiðis við veruligum (extremum) frávikum.

      Tá hesi fyrstu árini eru farin, skuldi verið møguligt at farið undir vanliga úrtøku. Prioriteringin verður tá hendan:
   1. Børn úr 5. flokki.
   2. Verulig frávik millum børnini í 2. flokki.
5. *Miðvís (=(systematisk) ortodontisk skipan verður bygd soleiðis:*
   A. Miðvísar kanningar, úrtøkur og viðgerðarætlanir verða gjørdar av sertannlækna helst á staðnum, har børnini eru, so at tosast kann við foreldur og skúlatannlæknan um somu ferð, tá tað er neyðugt.

      Tað skal tó viðmerkjast, at ta fyrstu tíðina kann tað vegna tíðartrot verða neyðugt, at skúlatannlæknarnir sjálvir taka børnini burturúr til viðgerðar eftir serligum reglum.

Av tí at tað í hesum fyrsta tíðarskeiði bert verður talan um viðgerð av teimum grovastu frávikunum, skuldi hendan fyribils loysnin verið fullgóð.

Tilboðið um viðgerð eigur at vera givið eftir somu fakligu eyðkennum fyri hvønn árgangin, lagað eftir tørvi, búskapi og manning.

B. *Viðgerðin:*
   a. Einfaldar viðgerðir kunnu, tá diagnosur og viðgerðarætlanir fyriliggja, býtast út til skúlatannlæknarnar í tann mun, teir hava áhuga og stundir til hetta arbeiðið. Sertannlæknin virkar í hesum førum sum konsulentur.
   b. Hin parturin av viðgerðunum fer fram á ortodontiklinikkini í samarbeiði millum tannlæknan og hjálparfólkið har.

C. *Ferðing:*
   Tann parturin av viðgerðini, sum verður í Havn, krevur rættuliga nógva *ferðing* hjá bygdabørnunum — og verður hetta ein týdningarmikil spurningur at loysa.

6. *Figgjan og ábyrgd:*
   A. *Landið* hevur figgjarligu ábyrgdina av:
      1. At seta á stovn og at útgera specialklinikkina.
      2. av tí dagliga rakstrinum, harundir at løna starvsfólkinum.
      3. og av tí barnaflutningi millum Havnina og bygdirnar, ið neyðugur er við skipum landsins.
   B. *Kommunurnar* bera tær útreiðslur, ið standast av
      1. teimum viðgerðum, sum teirra skúlatannlæknar gera.
      2. og tí flutningi, ið neyðugur er eftir landi, og sum skúlabussarnir áttu at átikið sær.

      Fyri kommunurnar verða tað sostatt ikki stórvegis eyka útreiðslur av hesum.
   C. Sertannlæknin hevur *ta fakligu og ta umsitingarligu ábyrgdina* av teirri ortodontisku skipanini.

Vinarliga
Bergtóra Hanusardóttir
Í Keypmannahavn 12. aprfl 1975

Løgtingstíðindi 1982 B - 90

**Skjal 12A**

**Skjøl til løgtingsmál 68:**

# Lóg um kredittkeyp

26.3.1983

Løgtingsins Lógarnevnd
her

Brúkarafelagið hevur havt lógina um KØB PÅ KREDIT til viðgerðar.

Vit taka undir við, at lógin verður sett í gildi við teimum broytingum, sum neyðugar eru.

Viðvíkjandi útgjaldingarhæddini, sum landsstýrið vil seta til 45%:

Avbetalingskeypið er dýrasti keypsformur í løtuni. §19 í LOV OM KØB PÅ KREDIT setir útgjaldingarhæddina til 20% av kontantprísinum, tá tað snýr seg um sølu við ognarfyrivarni út frá tí sjónarmiði, at hetta vil verja brúkaran ímóti illa umhugsaðum keypi orsakað av ágangandi og útspekuleraðum sølupolitikki. Brúkarafelagið tekur fult undir við hesum.

Vit kunnu harafturímóti IKKI taka undir við, at útgjaldingarhæddin skal vera 45% við tí grundgeving at avmarka nýtsluna av dýrum innfluttum lutum.

Vanligi løntakarin hevur í dag so gott sum ongan møguleika at ogna sær dýrar neyðugar brúkslutir innan fyri eina rúniliga tíð uttan at keypa upp á avbetaling, meðan ornur við betri umstøðum sum einki kunnu ogna sær hesar lutir

Tað hevur stóran týdning at øll í samfelagnum hava møguleika at ogna sær neyðugar brúkslutir.

Um 45% verður sett sum útgjaldingarmark, verður úrslitið, at bert tey, ið ringast eru fyri, skulu vera við til at avmarka nýtsluna av dýrum innfluttum lutum.

Harafturímóti kundu vit heldur hugsað okkum, at strangari gjaldstreytir verða settar fyri keyp av innfluttum luksusvørum.

Við heilsan
f. Brúkarafelagið
Marjun Berg

**Skjal 12B**

Sjóvinnubankin

11.04.83

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

Vit vísa á bræv landsstýrisins 21/3-83 viðvíkjandi uppskoti um lóg um kredittkeyp, har m.a. verður skotið upp at broyta útgjaldingina frá 20% til 45%, og skulu siga frá, at bankin ikki hevur nakrar viðmerkingar til uppskotið.

Vinarlig heilsan
P/F SJÓVINNUBANKIN
R. Olsen

**Skjal 12C**

Havnar Detailhandlarafelag
Postboks 117
3800 Tórshavn

Tórshavn, hin 15. februar 1983

Føroya Løgting
Tinghúsvegur
3800 Tórshavn

*Viðvíkjandi lógaruppskoti um minimum 45% útgjald av keypum uppá avgjaldassáttmála*

Vísandi til omanfyri nevnda lógaruppskot, sum er sett fram, loyva vit okkum við hesum at mótmæla uppskotinum, og vilja vit við hesum heita á Føroya Løgting um at vísa uppskotinum aftur.

Meting okkara er, at ein lóg sum hendan fullkomiliga kemur at seta fót fyri alla sølu uppá avgjaldssáttmála og soleiðis koma mongum av limum okkara ógvuliga illa við.

Við hávirðing
Havnar Detailhandlarafelag
H.C.W. Tórgarð

**Skjal 12D**

Vit undirritaðu og aðrir eru millum teirra, ið stórliga koma at kenna sviðan av nevnda lógaruppskoti.

| | | |
|---|---|---|
| Marstein<br>H. Marstein (sign.) | P/f S.H. Jacobsens Radiohandil<br>Heðin Jacobsen (sign.) | Nýggi Bókahandil<br>A. Zachariassen |
| Simme<br>(sign) | P/f Jákup á Dul<br>Poul Jacobsen (sign.) | |
| G. Rubeksen (sign.) | Ide Møblar<br>Birgir Andreasen(sign.) | LM-handilin<br>Johansen (sign.) |
| Møblasølan Innbúgv<br>Jógvan A. Joensen (sign.) | Zakarias Beck<br>Z. Beck (sign.) | Hjá Gundur<br>Jákup Jacobsen (sign.) |

**Skjal 12E**

F.B.V. — Felagið fyri Bilhandlarar og Verkstaðseigarar

Tórshavn, 16. feb. 1983

Til løgtingsformannin

Í sambandi við uppskotið um 45% í útgjaldi við keyp upp á sáttmála, sum er lagt fram á ting, vilja vit gera nakrar viðmerkingar og samstundis mótmæla, at hetta kemur at umfata bilar og dýr vinnutól.

Sum øllum løgtingsmonnum kunnugt hava nógvir bilhandlarar havt tað sera trupult hesi seinastu árini, og eru nakrir eisini farnir á heysin.

Tann í løtuni nakað vaksandi bilsøla hevur givið nýggjar vónir um hóast alt at vinna á trupulleikunum. Men verður hetta uppskot samtykt í verandi líki, er ongin ivi um, at bilsølan fer at steðga upp og minka, og harvið koma eini 100 arb.pláss í vanda.

Eitt annað er, at eins og aðrar vinnugreinir mugu vit eisini endurnýggja útgerð og maskinur. Hetta eru sera kostnaðarmikil tól, sum vit í løtuni kunnu keypa við 20% í útgjaldi. Verður útgjaldið hækkað til 45%, verða tað fá verkstøð, sum kunnu gera nýfløgur.

Ein annar vandi er, at nógvir keypssáttmálar fara til Danmarkar, har útgjaldið er 20%.

Vit mæla til, at hetta uppskot verður ikki samtykt í verandi líki. Heldur landsstýrið, at tað er bráðneyðugt við eini hækking av útgjaldinum fyri smærri sáttmálar, so latið keypssáttmálar, har keypsvirðið er oman fyri kr. 15.000,-, sleppa undan hækking.

Við hávirðing
Beinar Vestergaard

**Skjal 13A**

Skjøl til løgtingsmál nr. 76:

# Interkommunala ruskbrennistøðin á Saltnesi í Nes kommunu

5. august 1980

Nes kommuna
3850 Nes

*Viðv. bygging av brennistøð*

Eg loyvi mær hervið, sum advokatur fyri Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin, at søkja um byggiloyvi til brennistøð antin á Mýrunum ella omanfyri, uttanvert við Saltnes.

Hjálagt sendi eg makaskjal av frágreiðing frá Rambøll og Hannemann juli 1980, og vísi eg til innihaldið umframt skitsu.

Vísandi til fundin á Runavíkar Sjómansheimi hóskvøldið 31. juli 1980 skal eg her siga frá, at møguleikarnir við at leggja hana omanfyri Saltnes nú verða kannaðir við tí fyri eyga møguliga at kunna endurnýta hitan úti á Toftum.

Hendan umsókn skal skiljast sum ein formlig umsókn fyri at fáa eina principiella støðutakan til bygging ella ikki.

Tá ið endaliga økið er valt, og hvussu tær ymsu konstruktiónir skulu vera, verða nærri samráðingar tiknar upp við bygdarráðið.

Vónandi verður umsókn mín viðgjørd við vælvild, og loyvi eg mær at biðja um at fáa svar til nevndu umsókn áðrenn 20. august, tá eykaaðalfundur skal verða í felagnum júst um hetta mál.

Virðingarmest
Jógvan P. Lassen, adv.

**Skjal 13B**

Nes kommuna

Toftir, hin 18. august 1980

Harra Jógvan P. Lassen
advokatur
Bryggjubakki 22
3800 Tórshavn

*Viðv. J.nr. 327/80*

Viðv. umsókn tygara, dagfest 5. august 1980, fyri Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin um byggiloyvi til brennistøð, antin yviri á Mýrum ella oman fyri Saltnes innan fyri Høganes.

Hervið verður sagt frá, at bygdarráðið á fundi hin 14. august 1980 samtykti at svara:

At Nes kommuna prinsipielt kann geva tilsøgn um byggiloyvi, men kann uppá núverandi tíðspunkt ikki binda seg ti eitt ávíst øki, fyrr enn nærri kannингar av vansum og fyrimunum greitt siga okkum, hvat best egnaða staðið er, heruppií eisini økið á Fossdalsbakka.

Vinarlig heilsan
Nes kommuna
Jógvan J. Olsen

**Skjal 13C**

Færøernes Overfredningsnævn

3800 Tórshavn, den 30. marts 1982

Det meddeles herved, at Overfredningsnævnet på sit møde den 9. marts 1982 vedtog at stadfæste det lokale nævns afgørelse om at nægte tilladelse til at bygge forbrændingsanstalten på det nye sted.

Det vedtoges endvidere at udtale, at det alene er Overfredningsnævnet, der har kompetence til at genoptage en sag og ændre en truffen afgørelse, når ganske særlige omstændigheder taler derfor, og at sådanne særlige omstændigheder ikke foreligger i det omhandlede tilfælde.

Den af fredningsnævnet den 22. august 1980 trufne afgørelse, der er godkendt af Overfredningsnævnet, står derfor fortsat ved magt.

Joen H. Andreassen/Lise Lotte Nielsen
fm.

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn
att.: Inger Christensen

Lagtingstíðindi 1982 B - 91

**Skjal 13C**

Nes kommuna
3850 Toftir

Føroya Interkommunali renovatiónsfelagsskapur. FKRF

Toftir, tann 30. dec. 1980

*Viðvíkjandi: Ruskbrennistøð*

Vísandi til umsókn felagsins, dagfest 30.10.1980, um byggiloyvi til eina ruskbrennistøð uppi undir Høgancsi eystantil skulu vit siga frá, at bygdarráðið hevur viðtikið at svara játtandi við hesum treytum:

1. Bygging og rakstur av støðini verður at fylgja øllum teim lógum, reglum og kunngerðum — sum eru og framtíðar — sum eru/verða lýstar at galda í Føroyum frá løgtingi, landsstýri, heilsu- og nattúrufriðingarmyndugleikum, arbeiðseftirliti o.ø.
2. Herumframt er loyvið treytað av, at dygdin á brennistøðini svarar til tær reglur, sum danska »miljøministeriet« setir til slíka nú og í framtíðini.
3. Staðið, har brennistøðin verður ynskt at liggja, er einamest valt vegna tess, at tað skal verða høgligt at kunna nýta hitaorkuna frá støðini til upphiting av húsum og virkjum nærindis støðini. Tí verður ein treytin, at hesin hiti verður veittur seinast 1 ár eftir, at kommunan boðar frá, at hon ella hús/virkir í kommununi halda seg kunna nýta eina rímiliga nøgd av orku frá støðini, t.d. 1/4 av orkuframleiðsluni, sum støðin kann lata við fullari orku.

   Kommunan ella virkir/hús í kommununi hava tó ikki skyldu til at binda seg til at keypa orku frá støðini.

   Sáttmáli um orkukeyp verður at gera í hvørjum einstøkum føri.

   Fyri at tryggja støðuga hitaveiting, tá henda er byrjað, verður av FKRF ein oljufýrdur ketil at seta upp við eins stórari orku og brennistøðin at taka til, um støðgur kemur í brenningina av eini hvørjari orsøk.

Somuleiðis verður so stór oljugoymsla gjørd, at hon er nóg mikið stór til minst 1 mánaða nýtslu.

Goymslan verður at tyrva undir jørð og støðugt at halda full av olju.

Um nevnda støðuga hitaveiting kann fáast á annan hátt, kann samráðast um hetta.

Orkuprísurin, her uppi í gerð av fjarhitaleiðingum og hitatap í hesum v.m., má undir ongum umstøðum fara upp um tann prís, sum avvarðandi virki/hús sjálvi kundu framleitt hita fyri við einum vanligum olju- ella kolfýrdum ketli, tá orknnýtslan verður máld innan fyri húsavegg á teim húsum, ið orkuna keypa.

4. Neyðugir nýggir vegir og somuleiðis koyrileiðir fyri ruskbilum til og frá støðini verða at leggja eftir ávísing frá kommununi og í samráð við landsverkfrøðingin, har tað snýr seg um landsvegir.

   Kommunan bindir seg ikki til meira fíggjarliga byrðu í sambandi við gerð og viðlíkahald av slíkum vegum, enn um teir vóru landsvegir.
5. Felagið fær sjálvt til vega og rindar fyri grundøki til støðina.
6. Støðin verður at leggja soleiðis, at eingin møguleiki verður fyri, at frárenning frá støðini og grundøkinum sum heild kann koma at renna í Toftavatn, sum er drekkivatnsgoymsla hjá Runavíkar og Nes kommunum.

   Skittvatn frá støðini verður at leiða í kloakkreinsiverk. Avlopið frá hesum eins og frá grundøkinum, takvatn v.m. verður at føra á sjógv í tyrvdari leiðing eftir leiðum, sum kommunan skal góðkenna.

   Um kommunan ynskir tað, skal henni verða loyvt at binda aðrar kommunalar kloakkir í hesa frárenning ímóti at rinda meirkostnaðin, sum stendst av møguligum víðari rørum í sambandi við íbindingarnar.
7. Kølivatnsrør skal gravast niður, og kommunan verður at góðkenna leiðina.
8. Drekkivatnsíbinding kann ávísast av kommununi. Felagið verður at fylgja teim treytum og ávísingum, sum kommunan setir nú og í framtíðini vatnveitingini viðvíkjandi.
9. Um kommunan ynskir, at slagga og øska frá brenniovninum verður lagt á onnur pláss í kommununi enn á fasta ruskplássið, sum t.d. til vegagerð, uppfylling v.m., verður hetta at koyra hagar uttan útreiðslur fyri kommununa.

10. Áðrenn farið verður undir at gera støðina, verður detailprojekt at senda kommununi í góðar tíð — minst 2 mánaðir áðrenn byrjað verður — til góðkenningar.

    Byrjast má ikki, fyrrenn henda góðkenning fyriliggur.

11. Loyvt verður bert at koyra slíkt avfall til ruskstøðina og og grundøkið, har hon stendur, sum kann brennast í henni, og loyvt verður ikki at hava goymslu av ruski uttandura við støðina.

12. Tímamiðalvirðið av føstum bitlum í roykinum verður aftaná reinsking í mesta lagi 10% av tíðini ikki at fara upp um 150 mg/n m³ av turrum roykgassi við einum luftavlopi svarandi til 7% av $CO_2$ í roykinum.

13. Roykgassið verður ikki at hava í sær meira enn 10% av bitlum við størri tvørmáti enn 40 my.

14. Tímamiðalvirðið av $Co_2$ í roykinum kann í mesta lagi 10% av tíðini vera størri enn 1500 mg/N m³ av turrum roykgassi við einum luftavlopi svarandi til 7% av $CO_2$ í roykinum.

15. Tímamiðalvirðið av klorbrint í roykinum kann í hægsta lagi 10% av tíðini vera størri enn 800 mg/N m³ av turrum roykgassi við einum luftavlopi, sum svarar til 7% av $CO_2$ í roykinum.

16. Roykgasshitin skal, meðan roykurin fer gjøgnum eftirbrenni-zonuna, í minst 0,5 sekund vera omanfyri 800°C og í hesum tíðarbili hava í minsta lagi 6% av ilt í sær.

17. Innihaldið í slaggu og øsku aftan á brenning av evnum, sum kunnu fara í gering, verður ikki at fara upp um 0,3 vekt %, mátað eftir týska TUV-háttinum.

    Parturin av óbrendum evnum í brennirestini verður ikki at fara upp um 5,0 vekt%, mátað við at gløða eina royndarúttøku við 600°C lúta til støðuga tyngd.

18. Slaggur og øska skulu sópast út úr ovni og filtri í neyðugari nøgd gjøgnum eina vætueind og í vætaðum líki flytast í lokaðan kontainara og síðani saman við sóti víðari til goymslu ella avskipingarstað uttan at dálka umhvørvið.

19. Kontainarar hjá privatum at koyra rusk í skulu setast upp í so stórum tali, at ongantíð verður vandi fyri, at teir verða ovfyltir og skulu tømast inn í ovnin minst einaferð um dagin.

    Kontainaraplássið og alt økið hjá støðini, her undir vegir til, skal støðugt haldast rudduligt fyri pappír, plast v.m.

    Støðin skal seta upp skelti við innkoyringina til plássið, sum týðiliga sigur frá, hvussu kravt verður, at fram skal farast, tá rusk verður lagt í kontainarar.

Somuleiðis verður plássið at verða undir eftirlitið frá støðini.

20. Tað áliggur støðini, um tað skuldi komið fyri, at beina burtur møguliga dálking, sum kann haldast at hava vansar við sær fyri grannar, antin hesir stava frá lukti, dusti, larmi ella øðrum, íroknað dálking frá ov lítlari roykferð í skorsteininum.
21. Samlaði larmurin frá brennistøðini, mátað sum hin ækvivalenta støðuga, rættaða ljóðhæddin, verður ikki at fara upp um 50 d B (A) við einum fráleika av 100 m frá brennistøðini og hægst 45 d B (A) við nærmasta sethús.
22. Regnvatnsbrunnar til vatn frá tekjum og asfalteraðum/stoyptum økjum skulu hava sandfang og vatnlás.
23. Avlopsvatn má ikki verða heitari en 35°C, og PH-virðið skal liggja millum 6,5 og 9,0.
24. Roykhitin í ovninum og áðrenn elektrofiltrið, CO-innihaldið í roykinum og somuleiðis sóttalið í honum aftan á el-filtrið (roykfiltur) verður at máta og bókførast.
25. Støðin skal við mátingum í seinasta lagi 3 mánaðir aftaná, at hon er tikin í nýtslu, prógva, at treytirnar eru hildnar.
26. Emisiónsmátingar og mátingar av larmi skulu gerast sambært reglum, sum uppstillaðar eru í »miljøstyrelsens vejledninger nr. 7/1974« um »begrænsning af luftforurening fra virksomheder« og nr. 3/1974 um »ekstern støj fra virksomheder«.
27. Í sambandi við úrslitið av teim í pkt. 15 nevndu mátingum verða royndir og mátingar at gera so mikið ofta, sum kommunan ásetur. Máting av dustinnihaldi í roykinum og evnum, sum kunnu gera í slagguni og øskuni og av óbrendum evnum, skal tó fyribils gerast í minsta lagi 1 ferð um árið.
28. Mátiúrslitini verða at varðveita í 3 ár, og hjálagt skulu vera nágreiniligar upplýsingar, sum siga, undir hvørjum rakstrarviðurskiftum tey eru framkomin.
29. Støðin skal syrgja fyri, at dagbøkur verða førdar yvir rakstrartarn, brek í mátingartólum ella reinsiverki.
30. Mátiúrslit verða at senda kommununi í minsta lagi 1 ferð um árið saman við útroknaðum miðaltølum, frávikum frá hesum við tilskilan av max.-min. virðum av mátitølunum, og somuleiðis, hvussu ofta tað møguliga er farið út um tað ásetta markið.
31. Samanumtikið verður sett sum treyt, at bæði í sambandi við bygging og rakstur skal støðin út í æsir fylgja øllum teim treytum, frágreiðingum og projektinum sum heild, og at felagsskapurin stendur til svars fyri møguligum frávikum, sum kunnu koma fyri og ger og ber útreiðslurnar av neyðugum ábótum

hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi umsóknini um at fáa loyvi at nýta ruskplássið, sum nú er við Tinghellu, kann svarast, at áðrenn kommunan tekur støðu til henda spurning, verður heitt á felagið at koma við einum plani við frágreiðing um, hvussu ætlanin er at gera og reka framtíðar ruskplássið.

*Hesi skjøl verða sumanheft hjáløgd byggiloyvinum:*

a. »Runevig som varme opland« frá Rambøll & Hannemann A/S, dagfest 18/7-1980,
b. »Forundersøgelser for forbrændingsanlæg på Østerø« frá sama — juli 1980,
c. Umsókn til kommununa frá Jógvan P. Lassen, adv., vegna renovatiónsfelagsskapin dagfest 5. august 1980,
d. Svar uppá nevnda bræv dagfest 18. august 1980,
e. Bræv dagfest 28. august 1980 frá natúrfriðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu við útskrift av gerðabók hjá somu um fund tann 22. august 1980,
f. Bræv frá Færøernes Overfredningsnævn, dagfest 9. oktober 1980,
g. Mótmæli frá borgarum í Nes kommunu, dagfest 30. oktober 1980,
h. Umsókn frá Teknova vegna felagsskapin, dagfest 30. oktober 1980 við »Notati« frá Rambøll & Hannemann A/S, dagfest 27. oktober 1980 og
i. Bræv frá landslæknanum, dagfest 22. december 1980.

Vinarlig heilsan
Nes kommuna
Jógvan I. Olsen

makaskjal av fyrispurningi frá Yvirheilsunevndini til Miljøstyrelsen frá 16.6.82
makaskjal av avgerð frá Yvirheilsunevndini frá 25.10.82

Vísandi hertil loyvi eg mær at biðja um, at landsstýrið viðger málið skjótast gjørligt.

Virðingarmest
Jógvan P. Lassen, adv.

**Skjal 13D**

Leif Waagstein
landsrættarsakførari

Tormóður Djurhuus
advokatur

Dánjal Magnussen
advokatur

Jógvan P. Lassen
advokatur

3800 Tórshavn, 5. nov. 1982

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn

*Viðv. brennistøðini hjá I.R.F.*

Sum landsstýrinum kunnugt hevur Yvirheilsunevndin í avgerð frá 25. okt. 1982 tikið aftur loyvi frá heilsunevndini í Nes kommunu til byggjan av brennistøð.

Vísandi til §47 í standardheilsusamtyktini frá 29. sept. 1969 loyvi eg mær hervið vegna Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin at biðja um landsstýrisins góðkenning av fyriliggjandi ætlanum um byggan av brennistøð á Saltnesi.

Um málið er annars at siga, at Nes Bygdaráð 30.12.1980 gav endaligt byggiloyvi við ávisum treytum, sum Renovatiónsfelagsskapurin hevur góðkent.

Seinni hevur málið so verið í heilsunevndini á Nesi, sum gav byggiloyvinum sítt tilmæli.

Yvirheilsunevndin hevur hýtt seg í fýra minnilutar, har teir tríggir hóast alt finna saman í eini ávísari avgerð, meðan tann fjórði nevndarlimurin setur fram ymsar treytir, treytir sum I.R.F. kann góðkenna.

Vísandi hertil verður hildið, at treytirnar sambært §47 eru loknar, soleiðis at landsstýrið kann taka avgerð beinanvegin.

Annars viðleggi eg:
notat frá d.d.
makaskjal av skrivi til Yvirheilsunevndina frá 30.3.1982

**Skjal 13E**

Leif Waagstein
landsrættarsakførari

Dánjal Magnussen
advokatur

Tormóður Djurhuus
advokatur

Jógvan P. Lassen
advokatur

30. marts 82

Oversundhedskommissionen
v/Rigsombudsmanden
3800 Tórshavn

*Vedr. forbrændingsanlæg á Toftum*

Som meddelt på mødet i Oversundhedskommissionen 18. febr. d.å. ville Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin udarbejde en redegørelse og kommentar til det materiale, som Landslægen var kommet med.

I denne forbindelse vedlægger jeg »Kommentar til Landslægens brev af 17. februar 1982 vedrørende forbrændingsanlæg ved Runavík/Toftir«, hvilken redegørelse er udarbejdet af P/f Teknocon, Tórshavn, og Rambøl & Hanneman, Virum.

Som det fremgår af nævnte rapport, har rådgiverne koncentreret sig om de sundhedsmæssige spørgsmål og undersøgelser i forbindelse med forbrændingsanlæg og set bort fra Landslægens behandling af tekniske og økonomiske spørgsmål, idet man er af den opfattelse, at disse spørgsmål ikke henhører under Landslægens kompetance, og henviser jeg i det hele til vedlagte redegørelse.

Sagen — affaldsbortskaffelse på Færøerne — har, siden problemet rigtigt blev taget op, været til behandling igennem ca. 7 år, og det ville blive for omfattende i nærværende redegørelse at komme ind på alle stadier i sagens behandling.

Jeg vil derfor foreslå, at det møde, som oprindelig var aftalt mellem undertegnede og kommunelægen Sverre Lamhauge — som han senere aflyste — bliver afholdt, og vil jeg foreslå tirsdag 27. april 1982 om eftermiddagen, hvor Oversundhedskommissionen

og Sundhedskommissionen i Nes kommune kunne få en samlet og grundig gennemgang af hele sagsforløbet.

For såvidt angår behandlingen i Sunheds- og Oversundhedskommissionen kan undertegnede ikke lade være med at påpege det meget uheldige forløb, som mødet i Oversundhedskommissionen 18. febr. 1982 fik, idet det tydeligt kom frem, at såvel Sverre Lamhauge, kommunelæge, Høgni Debes Joensen, landslæge, var erklærede modstandere af projektet og for så vidt angår hr. Lamhauge, uden at han har haft mulighed for at gennemgå projektet og materialet. På mødet bekræftede hr. Debes Joensen, at modstanden var et tros- og holdningsspørgsmål, ligesom hr. Lamhauge fremkom med trusler mod Nes kommune om at ville fratræde som formand i Sundhedskommissionen i protest mod Nes kommunes holdning, hvilken trussel også direkte må få betydning overfor medlemmerne af Oversundhedskommissionen, såfremt de går imod hr. Lamhauges holdning i sagen.

Dette gør, at behandlingen i Sundhedskommissionen for så vidt hr. Lamhauges side vil være usaglig, ligesom det må lægges til grund, at landslægens holdning og på flere punkter usaglige argumentation gør sagsbehandlingen utilfredsstillende. I denne forbindelse vil jeg især påpege oplysningerne fra landslægen om, at affaldsforbrænding i Oslo kommune var forbudt, hvorimod det faktiske forhold er, at der har været affaldsforbrænding i Oslo kommune i mange år, ligesom Oslo kommune igennem rådgivningsingeniørfirmaet Rambøll & Hanneman planlægger et storstilet affaldsforbrændingsanlæg.

Slige argumenter gør troværdigheden af den af landslægen fremkomne redegørelse meget tvivlsom, men understreger på den anden side hans udsagn på mødet om, at hans stillingtagen var begrundet i tros- og holdningsspørgsmål.

Jeg vedlægger til Oversundhedskommissionens orientering »beskrivelse og betingelser ved. levering og montage af de maskinelle anlæg til affaldsforbrændingsanlæg på Østerø, Færøerne,« fra juni 1981 og henviser iøvrigt til indholdet.

Under henvisning til mit tidligere fremsatte forslag tillader jeg mig at anmode om, at nævnte møde bliver afholdt på Hotel Hafnia 27. april 1982 om eftermiddagen.

Med venlig hilsen
Jógvan P. Lassen, adv.

**Skjal 13F**

# Notat

Viðv. avgerð hjá Yvirheilsunevndini 25. okt. 1982

Nevndin í I.R.F. og sakkønu ráðgevarar hennara loyva sær at gera hesar viðmerkingar til omanfyri nevndu avgerð í sambandi við, at málið verður lagt fyri landsstýrið.

Grundgevingarnar í nevndu avgerð, skjal 1, 2, 3, fyri ikki at geva loyvi eru hesar:

*Skjal 1*

1. at kunnleiki ikki fyriliggur til stabilitets- og turbulensviðurskifti á Saltnesi
2. at tað ikki er nóg góð trygd fyri, at vatnveitingarlendið ikki kann verða dálkað
3. kann ikki taka undir við, at rusk verður flutt við skipi

*skjal 2*

4. at Yvirheilsunevndin ikki hevur sakkunnleika á økinum og ikki kann útiloka møguleikan fyri einari líðandi fysiskari, kemiskari og toksiskari skaðaávirkan á Toftavatn, vísandi til §9 stk. 1 í heilsusamtyktini
5. at møgulig skaðilig árin av Hg, Pb og Cd og øðrum toksiskum evnum ikki vil vísa seg, fyrrenn ein tíð er fráliðin, og at tað tá hevur skaðiliga ávirkan
6. at dálkingarmøguleikarnir frá brennistøðini eiga at verða loystir við tekniskum sakkunnleika á økinum

*skjal 3*

7. at brennistøðin við tí ætlaðu plaseringini er í stríð við §8 stk. 4 í heilsusamtyktini og §9 stk. 2
8. at tað er ógjørligt at siga, í hvønn mun brennistøðin í veruleikanum kann dálka umhvørvið

Til omanfyristandandi vil nevndin og ráðgevari hjá I.R.F. gera hesar viðmerkingar:

*Viðv. 1*
Við kanningunum av luftdálkingarmøguleikunum á økinum við Toftavatn, sí notat frá Rambøll & Hannemann 1980-10.27, eru júst hesi viðurskifti kannað fyri tær tríggjar møguligu plaseringarnar fyri eina brennistøð í Runavíkar-økinum.

Fyri at minka um útreiðslurnar til ógvuliga tíðarkrevjandi og kostnaðarkrevjandi mátingar av, hvat stað var best egnað at leggja hesa støð, var til grund fyri hesar útrokningar m.a. lagt, at øll luftdálking frá brennistøðini skuldi fara í Tórshavn, og vísti tað seg tá, at dálkingin av Toftavatni einans vildi verða 1/300 av tí, sum kann verða góðkent til drekkivatn. Út frá hesum varð mett ikki neyðugt at gera hesar mátingar.

Í hesum sambandi skal serliga verða gjørt vart við, at hesin »konservativi útrokningarmáti« neyvan kann vera rættur, tí eyðsæð er, at vindurin, sum er í Føroyum, kemur at føra stóran part til havs og aðrastaðni, men ger hetta bert viðurskiftini viðv. Toftavatni betri.

Annars verður víst til úttalilsi frá Miljøstyrelsen, har sagt verður, at slíkar kanningar ikki vera kravdar fyri smærri brennistøðir, og at hæddin á skorsteininum, um slík vildi verið gjøgnumførd, tá vildi verið lægri enn tað, sum ætlað er á brennistøðini á Nesi.

*Viðv. 2*
Vísandi til omanfyri standandi verður ikki hildið, at nøkur avgerandi dálking av Toftavatni verður vegna brennistøðina.

Sjálvandi hevur einhvør útviklingur við sær dálking, bæði fólk, flutningur við bili, upphiting av húsum, flakavirkir, skip v.m.

Eisini skal verða víst á, at brennistaðið á Tinghellu eystan fyri Toftavatn, har eingin reinsan fer fram — hóast tað, at rusknøgdirnar eru minni — ivaleyst dálka Toftavatn munandi meira, sum støðan er nú, enn ein møgulig brennistøð kann gera. Brennistaðið á Tinghellu verður niðurlagt, tá ið bennistøðin verður bygd.

*Viðv. 3*
Hertil er at nevna, at felagsskapurin hevur flutt rusk frá Norð-Streymoy til Thisted við M/S »Smyril« fyri at kanna brennivirkið, og varð hesin flutningur í vanligum kontainarum, sum vit kenna teir í Føroyum, og gav hetta ikki høvi til nakrar viðmerkingar frá hvørki manning, ferðafólki o.ø.

Í hesum sambandi verður serliga gjørt vart við, at ætlaðu kontainararnir verða afturlatnir og aftaná nýtslu trykkspulaðir við 150°C, so vandi fyri rottum v.m. tykist ógvuliga illa grundaður.

*Viðv. 4, 5 og 6*
At Yvirheilsunevndin metir seg ikki hava kunnleika til at taka avgerð í slíkum máli mátti havt við sær, at tey úttalilsi, sum rættuligi sakkunnleiki á økinum gevur, nevniliga Miljøstyrelsen, vórðu fylgd og tikin til eftirtektar.

Í útrokningini frá Rambøll og Hannemann 1980-10-27 er alt økið bæði við og kring Toftavatn tikið við í sambandi við metingina av møguligari dálking av Toftavatni.

Skuldi ein møgulig skaðilig dálking av Toftavatni hóast alt víst — nakað, sum kann verða prógvað við teimum ætlaðu mátingunum — kunnu viðurskiftini skjótt retablerast aftur, antin við at støðin í cina stutta tíð verður steðgað, ella at tað verða gjørdar broytingar í tekniskum installatiónum. Vatnskiftið i Toftavatni er ógvuliga stórt, soleiðis at ein møgulig dálking altíð kann upprættast aftur, við tað at nýtt vatn alla tíðina rennur til Toftavatn.

Tá ið tann »konservativi útrokningarmátin«, sum lagdur er til grund av Rambøll & Hannemann, av Miljøstyrelsen verður mettur »ikke foruroligende«, verur hildið, at heilsunevndin kundi styðjað seg til hesar upplýsingar og metingar og serliga vísandi til, at heilsunevndin av egnum ávum hevur biðið um hesar metingar og upplýsingar sum sín sakkunnleiki á økinum.

At ætlaða brennistøðin kann verða í stríð við §9 stk. 1 í heilsusamtyktini, má haldast at vera heilt burturvið, heldur tvørturímóti, tá ið brennistøðin heldur fór at minka um dálkingina við Toftavatn.

*Viðv. 7 og 8*
Her verður serliga gjørt vart við, at Miljøstyrelsen hevur mett um møguligan dálkingarvanda av Toftavatni, og hóast tær av Rambøll & Hannemann sera døpru metingarnar, sum lagdar eru til grund fyri útrokningina, meta teir ikki vandan av týdningi, sí omanfyri.

Hvat viðvíkur gr. 8 stk. 4, har nevnt verður, at forboðið er at dálka friðað vatnveitingarlendi yvirhøvur, er júst ávíst við úttalilsinum hjá Miljøstyrelsen, at dálking ikki fer fram av týdningi, og at viðkomandi lækni, um tann tulkingin av lógini, sum her verður framførd, varð løgd til grund, við sama rætti kundi forboðið allari bilferðslu í Runavíkar-økinum, allari upphiting og annars

øllum aktiviteti nærhendis møguligum vatnveitingarlendum, tí ein og hvør aktivitetur og hvørt menniskja í sær sjálvum dálkar náttúruna. náttúruna.

*Viðv. skjali 4* hevur nevndin samtykt at góðkenna tær 4 treytirnar, sum hesin parturin av heilsusamtyktini hevur ásett.

Tað er annars ilt at skilja, hví partar av Yvirheilsunevndini taka ta avgerð, sum tikin er í hesum máli, aftaná fyrst at hava boðað frá ikki at hava nóg hollan kunnleika á økinum og síðani innheinta úttalilsi frá einasta rættiliga og uttanveltaða sakkunnleika á økinum og síðani ikki fylgja og taka teirra meting til eftirtektar.

Í Danmark eru gjøgnum seinastu árini bygdar hópin av brennistøðum, sum allar eru undir heilsuligum eftirliti, eins og árinið á umhvørvið nágreiniliga verður kannað.

Hóast I.R.F. í sínum kanningum av møguligari dálking av Toftavatni hevur lagt sera daprar fyritreytir til grund, so heldur Miljøstyrelsen, at dálkingin *»ikke er foruroligende«*.

Enn meira løgin tykist avgerðin, tá ið hugsað verður um, hvussu ruskspurningurin í dag er loystur t.d. í Klaksvík, norðuri á Krossi, við Tinghellu og ikki minst í Havnardali, og at hetta ótarnað hevur hildið áfram seinastu árini, og, um ætlaða brennistøðin á Saltnesi ikki verður bygd, framhaldandi verður einasta skipaða ruskloysn.

Hvat serliga viðvíkur Havnardali, so er her talan um ein opnan brenniovn uttan nakran luftreinsan og ruskdunga við síðuna av. Í Havnardali verður alt ruskið frá m.a. Landssjúkrahúsinum — leysliga mett 15.-20.000 plastikkposar — brent, og tá ið eín frá bløðunum hevur fingið at vita, at sjálvt vrakað frímerki ikki kunnu brennast í ovninum, er óskiljandi, at hendan skipan kann hava hildið fram í so mong ár.

Í ruskdunganum er eitt ótal av rottum.

Men hóast alla hesa óhumsku hava mátingar av drekkivatninum í Havnardali ikki víst, at vatnið er dálkað.

Fært verður tí fram, at avgerðin hjá pørtunum av Yvirheilsunevndini frá 25.10.1982 viðv. brennistøðini á Saltnesi er ósaklig og uttan heimild í heilsusamtyktini, tá ið upplýsingar, kanningar og saklig úttalilsi, sum fyriliggja, og sum nevndin sjálv partvís hevur innheintað, ikki verða løgd til grund fyri avgerðina.

Tórshavn, tann 5.11. 1982
Jógvan P. Lassen, adv.

# *Tóm síða*

**Skjal 13G**

Oversundhedskommissionen

25. oktober 1982

Advokat Jógvan P. Lassen
Bryggjubakki
Tórshavn

Det meddeles herved, at man dags dato har skrevet således til Færøernes Interkommunale Renovationsfællesskab, v/formanden Jógvan Isaksen, Klaksvík:

»Ved mødet den 21. oktober 1982 har oversundhedskommissionen truffet følgende

**Afgørelse**

i henhold til standardsundhedsvedtægtens (kunngerð nr. 68 af 29. september 1969 um eina standard heilsusamtykt) §8 og §21:

Sag vedrørende forbrændingsanlæg á Høganesi, Nes kommune.

Afgørelsen er truffet af rigsombudsmand Niels Bentsen (formand), landslæge Høgni Debes Joensen, kommunelæge Álvur av Kák og kommunelæge Pól Johs. í Horni. Kommunelæge Sverri Lamhauge deltog ikke i behandlingen af sagen, idet han som formand for sundhedskommissionen i Nes må betragtes som inhabil.

Sagen er indbragt for oversundhedskommissionen ved skrivelse af 27. april 1982 fra Dánjal Eli í Hjøllum, Súni í Hjøllum, Sigrun Smidt Joensen, Malla Smidt Joensen, Karl Johannesen, alle boende i Nes, samt Jaspur Hansen, Hans T. Olsen, Jacob Davidsen, Johan Hammer og Ingvard Petersen, alle boende i Runavík.

*Redegørelse for sagen*

Det fremgår af sagen, at rådgivende ingeniørfirma TEKNOCON på vegne Færøernes Interkommunale Renovationsselskab i skrivelse af 30. oktober 1980 ansøgte Nes kommune om byggetilladelse

til anlæg af et forbrændingsanlæg ved Saltnes. Ansøgningen var bl.a. bilagt redegørelserne fra rådgivende ingeniørfirma Rambøll og Hannemann, »Forundersøgelse for forbrændingsanlæg på Eysturoy« af juli 1980, og Placering af forbrændingsanlæg samt beregning af skorstenshøjde under hensyntagen til begrænsning af luftforurening« af 27. oktober 1980. Det fremgår bl.a. af de nævnte redegørelser, at det påtænkte anlæg består af én forbrændingsovn med en kapacitet på 2,5 tons pr. time. Ovnen forventes at være i drift ca. 100 timer om ugen. Den nødvendige skorstenshøjde er beregnet til 53 meter.

Ved at holde en temperatur på 800-1000°C i ovnen undgås luftgener fra selve forbrændingsanlægget. Der etableres et elektrostatisk filter i forbrændingsanlægget for effektivt at udskille partikler fra røggasserne. Spildevandsproduktionen i forbindelse med anlægget anslås til ca. 1 m³ pr. døgn og består hovedsagelig af spildevand fra mandskabsfaciliteterne og fra rengøringsformål. Det oplyses endvidere, at det til befugtning anvendte vand opsuges i slaggerne og derfor kun giver et uvæsentligt bidrag til spildevandsmængden.

Det fremgår endvidere af et notat fra november 1981 udarbejdet af p/f Teknocon, at indsamling af affald fra de forskellige steder på Færøerne skal foregå i komprimator-biler. Hvor transport ad søvejen er nødvendig, omlastes affald fra lokale affaldscontainere til en komprimator-container. Denne transporteres herefter med Strandferðslans skibe til en central havn, hvorefter affaldet bringes til forbrændingsanlægget. Det bemærkes iøvrigt, at omtalte container næppe er 100% lufttæt, hvad angår lugt, men at man —såfremt der måtte vise sig at opstå problemer i den forbindelse — har planer om at udstyre containerne med et udsugningsanlæg.

Nes kommune har i skrivelse af 30. december 1980 givet byggetilladelse til etablering af anlægget på følgende vilkår:

1. Bygning og drift af anlægget skal ske i overensstemmelse med alle de nugældende love, bestemmelser og kundgørelser foruden fremtidige — der er/vil blive sat i kraft på Færøerne af lagtinget, landsstyret, sundheds- og naturfredningsmyndighederne, arbejdstilsyn m.m.
2. Herudover er tilladelsen betinget af, at forbrændingsanlæggets kvalitet altid er i overensstemmelse med de krav, det danske miljøministerium nu stiller og i fremtiden vil stille til sådanne.
3. Stedet, hvor forbrændingsanlægget ønskes placeret, er særligt valgt, fordi det skal være bekvemt at kunne anvende varmeenergi fra anlægget til opvarmning af omkringliggende huse og virk-

somheder. På grund heraf er det en betingelse, at varmeenergi kan leveres senest 1 år efter, at kommunen meddeler, at den eller beboelseshus/virksomheder i kommunen mener at kunne anvende en rimelig andel af energien fra anlægget for eks. 1/4 af energiproduktionen, som anlægget maksimalt kan yde. Kommunen eller virksomheder/hus i kommunen er dog ikke forpligtet til at købe energi fra anlægget.

Kontrakt vedrørende energikøb bliver indgået i hvert enkelt tilfælde for sig.

For at sikre konstant varmeleverance, når denne er begyndt, skal FKRF bygge en oliefyret kedel med lige så stor kapacitet som forbrændingsanlægget som reserve i tilfælde af, at anlægget standser af en eller anden årsag.

Ligeledes skal der anlægges et olielager, der kan rumme olieforbruget for 1 måned.

Lageret skal anlægges under jorden og til stadighed være fuldt lagret af olie.

Såfremt denne konstante varmeleverance kan etableres på anden måde, kan dette afgøres ved nærmere forhandling.

Energiprisen, herunder udgifterne i forbindelse med et etablering af fjernvarmeanlæg og varmetab i dette m.m., må under ingen omstændigheder overstige det beløb, som de pågældende virksomheder og beboelseshuse selv er i stand til at producere med almindelige olie- og kulfyrede kedler, da energiforbruget bliver målt inde i de ejendomme, der aftager ovennævnte energi.

4. Mulige nye vejanlæg for affaldsbiler til og fra anlægget skal anlægges efter anvisning fra kommunen og i samråd med landsingeniøren, når det drejer sig om landsveje.

   Kommunen forpligter sig ikke til større økonomiske udgifter i forbindelse med anlæg og vedligeholdelse af disse veje, end såfremt disse var landsveje.
5. Selskabet anskaffer selv og for egen regning grundarealet til anlægget.
6. Anlægget skal placeres således, at der ikke er mulighed for, at afløb fra anlægget og grundområdet i sin helhed kan afledes i »Toftavatn«, der er drikkevandsreservoir for Runavík og Nes kommuner.

   Spildevand fra anlægget skal føres i et kloakrenseanlæg. Overskuddet herfra og fra grundarealet som sådan, tagvand m.m., skal ledes til havet i underjordiske ledninger efter kommunens godkendelse.

Såfremt kommunen måtte ønske det, skal denne have tilladelse til at forbinde andre kommunale kloakledninger i dette fraløb imod at betale merudgifterne i denne forbindelse.

7. Kølvandsrør skal nedgraves og godkendes af kommunen.
8. Kommunen anviser muligheden for drikkevand til anlægget. Renovationsselskabet skal følge de regler og anvisninger, som kommunen har sat og vil sætte i fremtiden vedrørende drikkevandsledninger.
9. Såfremt kommunen måtte ønske, at slagge og aske fra forbrændingsanlægget bliver placeret andre steder i kommunen end på den faste affaldsplads, dette i forbindelse med vejanlæg o.l., skal slaggen og asken føres der uden udgift for kommunen.
10. Forinden opførelsen af anlægget starter, skal detailprojekt tilsendes kommunen til godkendelse - i hvert fald 2 måneder før. Arbejdet må ikke påbegyndes, før bygderådets godkendelse foreligger.
11. Det er ikke tilladt at placere anden renovation ved forbrændingsanlægget og det omkringliggende areal bortset fra det, der er brændbart, ligesom det ikke er tilladt at opbevare affald udendørs ved anlægget.
12. Timemiddelværdien af faste partikler i røggassen må efter rensning højst 10% af tiden være større end 150 mg pr. normal kubikmeter tør røggas ved et luftoverskud svarende til 7% kuldioxid i røgen.
13. Røggassen må ikke indeholde mere end 10% partikler med en diameter større end 40 my.
14. Timemiddelværdien af svovldioxid i røggassen må højst 10% af tiden være større end 1.500 mg pr. normalkubikmeter tør røggas ved et luftoverskud svarende til 7% kuldioxid i røgen.
15. Timemiddelværdien af Clorbrinte i røggassen må højst 10% af tiden være større end 800 mg pr. normalkubikmeter tør røggas ved et luftoverskud svarende til 7% kuldioxid i røgen.
16. Røggassens temperatur under dens passage gennem ovnens efterforbrændingszone skal i mindst 0,5 sekund være over 800°C og herunder indeholde 6% ilt.
17. Indholdet af forgærbare bestanddele i forbrændingsresten (aske og slagger) må ikke overstige 0,3 vægt-%, bestemt efter den tyske TUV-metode. Andelen af uforbrændte bestanddele i forbrændingsresten må ikke overstige 5,0 vægt-%, bestemt ved glødning af en repræsentativ prøve ved 600°C til konstant vægt.
18. Slagger og flyveaske skal udtages fra forbrændingsovn og filter

og i fornødent omfang via befugtningsanlæg og i befugtet tilstand transporteres til lukkede containere og bortkøres til deponering sammen med sod, uden at der herved opstår gener for omgivelserne.

19. Containere til opbevaring af affald fra private skal opsættes i et så stort antal, at der aldrig bliver fare for, at disse bliver overfyldt, ligesom disse skal tømmes i anlægget mindst en gang om dagen.

    Containerpladsen og virksomhedens areal skal holdes renset for papir, plast m.m.

    Anlægget skal foranledige tydelige skilte anbragt ved indgangen til containerpladsen med ordensforskrifter.

    Ligeledes skal arealet være under konstant kontrol fra selskabets side.

20. Det påhviler virksomheden i påkommende tilfælde at fjerne sådanne fra forbrændingsanlægget hidrørende ulemper, som må karakteriseres som væsentlige for omboende, hvadenten disse ulemper foreligger i form af lugt, støv eller andet nedfald, herunder også nedfald forårsaget af ringe røghastighed i skorstenen.
21. Det resulterende støjniveau fra forbrændingsanlægget, målt som det ækvivalente, konstante, korrigerende lydniveau må ikke overskride 50 d B (A) med en afstand på 100 m fra forbrændingsanlægget og højst 45 d B (A) ved nærmeste beboelseshus.
22. Nedløbsbrønde for regnvand såvel fra tage som fra befæstede arealer skal forsynes med sandfang og vandlukke.
23. Spildevandstemperaturen må ikke overstige 35°C, og spildevandets surhedsgrad skal ligge i pH-intervallet 6,5-9,0.
24. Røgtemperaturen i ovnen og før elektrofilter, kuldioxidkoncentration i røggassen og sodtal i røggassen efter elektrofilter (røgfarve) skal måles og registreres.
25. Virksomheden skal senest 3 måneder efter anlæggets ibrugtagning ved målinger lade eftervise, at vilkårene er overholdt.
26. Emissionsmålinger og målinger af støjniveau skal foretages efter de retningslinier, der er opstillet i miljøstyrelsens vejledninger nr. 7/1974 om begrænsning af luftforurening fra virksomheder og nr. 3/1974 om ekstern støj fra virksomheder.
virði, ávikavist framleiðsluvirði, sum vørurnar hava, tá inntøkuárið gongur út, har ið keyðsvirðið, ávikavist framleiðsluvirðið, í royndum hevur verið lægri, er loyvt at rokna við tí. Tó skulu í landbúnaði og urtagarðsyrki egnir úrdráttir (sbr. 111. gr. nr. 3) altíð verða taldir uppí við tí søluprísi, ið fæst um tað bilið, uppgjørt verður, tá ið 20% eru frá.

udløb gældende indkøbspris, respektive produktionspris, medmindre den faktiske anskaffelsespris, respektive produktionspris, har været lavere, i hvilket tilfælde denne sidste pris kan benyttes. For land- og havebrugsvirksomheder skal beholdningen af egne produkter (jfr. prg. 111, nr. 3) dog altid optages til den salgspris, som vil kunne opnås på opgørelsestidspunktet, med fradrag af 20%.

**27. gr.** Ágóði av sølu ella avhending av ognum hjá hinum skattskylduga verður roknaður fyri skattskylduga inntøku, tá søla av slíkum ognum fellur undir vinnu hansra, ella tá hann hevur keypt ognarlutin fyri at selja tey hann aftur við ágóða. Selur hin skattskyldugi fastogn, skip eins og partabrøv og tílík almenn virðisskjøl, og hava tey verið ogn hansara styttri enn 2 ár, má ætlast, at hann hevur ognast tey til tess at selja tey aftur við ágóða, uttan prógvað verður, at so var ikki.

**prg. 27.** Avance ved afhændelse eller afståelse af den skattepligtiges ejendel betragtes som skattepligtig indkomst, forsåvidt salg af den pågældende art hører til vedkommendes næringsvej, eller den pågældende formuegenstand er erhvervet i spekulationsøjemed. Sker salg af fast ejendom, skibe samt aktier og lignende offentlige værdipapirer inden 2 år efter erhvervelsen, anses spekulationshensigt at have foreligget, medmindre det modsatte godtgøres at være tilfældet.

**28. gr.** Løn og onnur samsýning samb. starvssáttmála millum arbeiðsgevara og løntakara, sum liður í vanligu arbeiðsgongd arbeiðsgevarans, og sum fellur til gjaldingar aftan á avvarðandi vinnuskeið, er skattskyldug í tí inntøkuári, hon er útgoldin. Er lønin ella samsýningin ikki útgoldin við endan á tí álmanakka-

**prg. 28.** Løn og andet vederlag i henhold til faglig overenskomst mellem arbejdsgiver og arbejdstager, som led i arbejdsgiverens sædvanlige forretningsgang, og som kommer til udbetaling efter udløbet af den pågældende indtjeningsperiode, indkomstbeskattes i det indkomstår, hvori udbetalingen

ári, sum kemur beint aftan á tað álmanakkaár, har løntakarin hevur vunnið sær endaligan rætt til hana, skal hon tó takast við sum skattskyldug inntøka í hesum seinna álmanakkaárinum.

*2. stk.* Reglurnar frammanfyri verða at nýta samsvarandi, viðvíkjandi aðrari A-inntøku enn løn.

*3. stk.* Heldur skattskylda løntakarans uppat, er tann inntøkan, sum nevnd er í 1. og 2. stk., í seinasta lagi skattskyldug, tá skattskyldan heldur uppat.

*4. stk.* Líkningarráðið hevur heimild at áseta, at A-inntøka av ávísum slag ikki skal koma undir reglurnar í 1. og 2. stk., soleiðis at hon verður skattskyldug í tí ári, hon er vunnin, smb. 25. gr. Serstakar reglur verða at galda fyri frítíðarløn.

**29. gr.** Til skattskylduga inntøku teljast ikki:

1) vinningur av sølu av ognum hjá hinum skattskylduga, tá hann fellur ikki undir reglurnar í 27. gr., ella reglurnar í 1. og 2. kap. í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.,

2) ognarvøkstur, sum stavar av tí, at óseldir ognarlutir hjá hinum skattskylduga hækka í virði — eins og ognarminking av tí, at teir lækka í virði, heldur ikki má verða drigin frá inn-

finder sted. Har udbetalingen ikke fundet sted ved udgangen af det kalenderår, der følger umiddelbart efter det kalenderår, i hvilket indkomstmodtageren har erhvervet endelig ret til den pågældende indkomst, er beløbet dog indkomstskattepligtigt i dette indkomstår.

*stk. 2.* Foranstående regler finder tilsvarende anvendelse med hensyn til anden A-indkomst end løn.

*stk. 3.* Ophører indkomstmodtagerens skattepligt, er den i stk. 1 og 2 omhandlede A-indkomst senest indkomstskattepligtig på tidspunktet for skattepligtens ophør.

*stk. 4.* Ligningsrådet kan bestemme, at en vis art af A-indkomst ikke skal være omfattet af bestemmelserne i stk. 1 og 2, således at beskatningen sker i indtjeningsåret, jfr. prg. 25. For feriegodtgørelse fastsættes særlige regler.

**prg. 29.** Til skattepligtig indkomst henregnes ikke:

1) fortjeneste ved realisation af den skattepligtiges ejendele, som ikke falder ind under reglerne i prg. 27, eller reglerne i kap. 1 og 2 i lagtingslov om skatlige afskrivninger m.m.,

2) formueforøgelse, der skyldes prisstigning på den skattepligtiges urealiserede ejendele — ligesom formueformindskelse, der skyldes prisfald vedrørende disse, ikke kan fradrages i ind-

tøkuni, sbr. tó 26. gr. 3. stk.

3) gávur, sum hin skattskyldugi ella persónar, ið verða skattaðir saman við honum, hava fingið frá hjúnafelaga, avkomi, foreldrum (heruppií eisini ættleiðingarforeldrum) ella abba og ommu, sbr. tó her 5. gr. 4. stk., somuleiðis ognarvøkstur, ið stavar frá arvi og greiðslu frammanundan burtur av arvi, falnum og ófalnum, ella av tí at eftirsitandi hjúnafelagi tekur við felagsbúgvi til at sita í óskiftum búgvi,

4) ognarvøkstur, ið stavar av giftu,

5) útgoldin lívstryggingarpeningur og tílíkt, eins og endurgjald sambært vanlukkuavlamis- og sjúkratrygging, tá endurgjald er ikki latið sum tíðarviss gjøld ella sum endurgjald fyri mista vinnuinnløgu,

6) útgoldið endurgjald sambært trygging av fastogn ella leysafæ, uttan so at søluvirðið, um hesir ognarlutir høvdu verið seldir, átti at teljast upp í ta skattskyldugu inntøkuna,

7) gjøld, sum hitt almenna hevur fyriskipað einans til at gjalda kostnað av almennum ella embætisligum starvi, tá tey ikki innihalda nakra samsýning fyri vinnu, og somuleiðis tilsvarandi gjøld, ið loyvishavandi og privat virki rinda,

8) vinningur av burturluting



komsten jfr. prg. 26, stk. 3.

3) gaver, som den skattepligtige eller med ham sambeskattede personer har modtaget fra ægtefælle, afkom, forældre (herunder også adoptivforældre) eller bedsteforældre jvnf. dog prg. 5, stk. 4, samt formueforøgelse, som hidrører fra arv og forskud på såvel falden som ikke falden arv eller fra den efterlevende ægtefælles overtagelse af fællesboet til hensidden i uskiftet bo,

4) formueforøgelse, der hidrører fra indgåelse af ægteskab,

5) udbetaling af livsforsikringssummer og deslige samt erstatning i henhold til ulykkes-, invaliditets eller sygeforsikring, såfremt erstatningen ikke har karakter af en periodisk ydelse eller af erstatning for tabt arbejdsfortjeneste.

6) udbetaling af erstatning i henhold til forsikring af fast eller rørlig ejendom, medmindre salgssummen ved et eventuelt salg af de pågældende ejendele ville have været at henregne til den skattepligtige indkomst,

7) ydelser, der er fastsat af det offentlige udelukkende til dækning af udgifter ved offentligt eller tjenstligt hverv, og som ikke indeholder noget arbejdsvederlag, samt tilsvarende ydelser, der udbetales af koncessionerede og private virksomheder,

8) gevinst ved bortlodning

v.m., jmt. løgtingslóg nr. 11 frá 9. apríl 1968 og happadráttinum, jmt. løgtingslóg nr. 49 frá 16. juni 1950 við seinni broytingum, eins og vinningar í donskum og føroyskum premiulánsbrøvum,

9) tann partur av teirri samsýning, fólkatingsmenn eiga, sum eftir ríkislóg er kostnaðarviðbót, og tann kostnaðarviðbót, sum eftir løgtingslóg verður veitt løgtingsmonnum eftir bústaði.

10) sømdarpeningur í goldin sambært lóg nr. 93 frá 20. mars 1940 um »udbetaling af hædersgaver til danske sømænd og fiskere og deres efterladte« og sambært lóg nr. 383 frá 9. august 1945 um »visse hædersgaver til danske søfarende og fiskere og deres efterladte«,

11) virði av vistarhaldi hjá sjófólki umborð,

12) sømdar- og heiðurspeningur, sum veittur verður uttan umsókn, tó undantiknar fastar árligar veitingar. Studningur, sum tað almenna ella góðkendir gávufægrunnar og aðrir grunnar lata lesandi og lærlingum,

13) ellisviðbót eftir 10. gr., persónlig viðbót eftir 14. gr. og hjálpar-, røktar- og avlamisviðbót eftir 16. gr. í lóg nr. 58 frá 15. mars 1967 um fólkapensjón við seinni broytingum, avlamisgjøld eftir 4. gr. 2. stk., hjálpar- og røktarviðbót eftir

m.v. jvf. lagtingslov nr. 11 fra 9. april 1968 og lotteri jfr. lagtingslov nr. 49 af 16. juni 1950 med senere ændringer, samt præmier i danske og færøske præmieobligationer,

9) den del af det folketingsmedlemmer tilkommende vederlag, som i henhold til lov udgør omkostningstillæg, og det omkostningstillæg, som i henhold til lagtingslov tilkommer lagtingets medlemmer efter bopælen.

10) hædersgaver, udbetalt i henhold til lov nr. 93 af 20. marts 1940 om udbetaling af hædersgaver til danske sømænd og fiskere og deres efterladte og lov nr. 383 af 9. august 1945 om visse hædersgaver til danske søfarende og fiskere og deres efterladte,

11) søfolks kost ombord i skibe.

12) hædersgaver, som tildeles uden ansøgning, dog med undtagelse af faste årlige ydelser. Tilskud, som det offentlige eller godkendte legater og fonds yder studerende og lærlinge.

13) alderstillæg efter prg. 10, personlige tillæg efter prg. 14 og bistands-, pleje- og invaliditetstillæg efter prg. 16 i lov nr. 58 af 15. marts 1967 om folkepension med senere ændringer, invaliditetsbeløb efter prg. 4, stk. 2, bistands- og plejetillæg efter prg. 11, personligt tillæg efter prg.

11. gr., persónlig viðbót eftir 15. gr., avlamisveiting, hjálpar- og røktarviðbót hartil eftir 16. gr., veitingar eftir 31. og 32. gr. og avlamisviðbót og hjálparviðbót eftir 45. gr. í lóg nr. 55 frá 15. mars 1967 um avlamispensjón v.m. við seinni broytingum og veitingar eftir 14. gr. 14 A. gr. og persónligar viðbøtur eftir 9., 15., 22. og 29. gr. í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 um almenna forsorg, sum henda lóg er broytt við lóg nr. 224 frá 27. mei 1970,

14) tað, sum útgoldið verður limunum í teimum í 1. gr. nr. 11 nevndu keypssamtøkum, í mun til tað, teir hava keypt av vørum og tænastum.

15, invaliditetsydelse, bistands- og plejetillæg hertil efter prg. 16, ydelser efter prg. 31 og 32 og invaliditetstillæg og bistandstillæg efter prg. 45 i lov nr. 55 af 15. marts 1967 om invalidepension m.v. med senere ændringer samt ydelser i henhold til prg. 14, 14 a og personlige tillæg efter prg. 9, 15, 22 og 29 i lov nr. 56 af 15. marts 1967 om offentligt forsorg, som denne er ændret ved lov nr. 224 af 27. maj 1970.

14) det udbytte, der udbetales til medlemmerne af dem i prg. 1, nr. 11 omtalte brugsforeninger i forhold til det de har købt af varer og tjenester fra foreningen.

**30. gr.** Av vinningsbýti, sum sambært 25. gr. nr. 3 ikki er undir skattskyldu hjá móttakara, verður latið eitt avgjald til landskassan upp á 20%. Felag, sum útlutar vinningsbýti, skal halda aftur hetta avgjald og í seinasta lagi 14 dagar aftan á aðalfundarsamtykt um hetta rinda peningin til Føroya Gjaldstovu.

*2. stk.* Hevur felag v.m. ikki goldið afturhildna avgjaldið sambært 1. stk., verður renta at rokna við 1% um mánaðin frá 1. í tí mánaði, sum kemur aftan á, at avgjaldið skuldi verið goldið sambært 1. stk., og til goldið er. Rentan kann ikki verða frádrigin, tá skattskylduga inntøka

**prg. 30.** Af aktieudbytte, som i henhold til prg. 25, nr. 3 er undtaget skattepligt hos modtageren, erlægges til landskassen en afgift på 20%. De selskaber, der foretager udlodning, skal tilbageholde denne afgift og senest 14 dage efter generalforsamlingsvedtagelse herom indbetale beløbet til Føroya Gjaldstovu.

*Stk. 2.* Har et selskab m.v. ikke indbetalt den tilbageholdte afgift iflg. stk. 1 påløber der afgiften renter med 1% månedlig fra 1. i måneden, der begynder efter at betalingen skulle være foretaget iflg. stk. 1, til afgiften er betalt. Disse renter kan ikke fradrages i selskabets skatteplig-

felagsins verður uppgjørd. Reglurnar í 135. gr. 3. stk. um rættin til at panta avgjaldið er eisini galdandi í hesum føri.

*3. stk.* Fyri vinningsbýti av partabrøvum og lutaprógvum verður roknað alt, ið partaeigarar ella luthavarar fáa útgoldið sum partur av avlopi felagsins í síðsta roknskaparári ella undanfarnum árum, annaðhvørt hetta avlop er tilkomið sum innvunnið rakstraravlop, av sølu ella uppskriving av ognum felagsins ella á annan hátt, og annaðhvørt tað er útgoldið sum vinningsbýti, sum útlutan, tá felagið er avtikið, ella tílíkt.

*4. stk.* Fyri vinningsbýti, tá felag verður avtikið, verður roknað alt, sum útlutað verður avvarðandi partaeigara meira enn av inngoldnum partapeningi.

**31. gr.** Tá skattskyldug inntøka verður uppgjørd, skal frá inntøkuni verða drigin rakstrarkostnaður, t.e. tær útreiðslur, sum í árinum ganga til at vinna inntøkurnar, tryggja tær og halda teimum við, so sum

a) eftirlønir ella tilskot til eftirløningar teirra, sum starva ella hava starvað í vinnu skattgjaldarans,

b) útreiðslur til umvælingar, tryggingar og umsitingar av húsum, skipum, maskinum, innbúgvi og øðrum rakstraramboð-

tige indkomst. Afgiften kan gøres til genstand for udpantning efter reglerne i prg. 135, stk. 3.

*Stk. 3.* Som udbytte af aktier og andelsbeviser anses alt, hvad der udbetales aktionærer eller andelshavere som en del af selskabets overskud i det sidste eller tidligere regnskabsår, hvad enten dette overskud er fremkommet som indtjent driftsoverskud, ved realisation eller opskrivning af selskabets aktiver eller på anden måde, og hvad enten udbetaling finder sted som dividende, som udlodning ved selskabets likvidation eller lignende.

*Stk. 4.* Som udbytte ved selskabets likvidation anses alt, hvad der udloddes den pågældende aktionær udover den indbetalte aktiekapital.

**prg. 31.** Ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst foretages fradrag for driftsomkostninger, d.v.s. de udgifter, som i årets løb er anvendt til at erhverve, sikre og vedligeholde indkomsten, herunder også

a) bidrag til pensionering af eller pensionsydelser til personer, der er eller har været ansat i den skattepligtiges erhvervsvirsomhed,

b) udgifter til reparation, forsikring og vedligeholdelse af de i den skattepligtiges virksomhed anvendte bygninger, skibe, ma-

um, sum hin skattskyldugi hevur nýtt í virki sínum, tó ikki meira, enn nýtt er til at bøta um slit og brek, sum á er komið eftir tað, at hann hevur fingið sær nevndu rakstraramboð,

c) peningur, sum í útgerðarstarvi ella veiðu á sjónum verður lagdur niðurfyri til klassingar og umvælingar av skipi. Hesar avsetingar tilsamans kunnu í mesta lagi verða 10% av tí fyrstu 1.000.000 kr. av útveganarvirðinum og 5% av útveganarvirðinum oman fyri 1.000.000 kr. og skulu inntøkuførast aftur í seinasta lagi 4. inntøkuár aftan á avsetingarárið ella tað árið, skipið verður latið av hondum,

d) árlig avskriving skipað við serligari lóg. Avskriving hjá persónum má tó ikki verða størri enn so, at skattskylduga inntøkan í minsta lagi er líka stór sum livikostnaðurin eftir tí prístalsgrundarlag, sum hvørja tíð er galdandi. Frá og við 1. januar 1976 galdandi frá og við inntøkuárinum 1975 verður prístalsgrundarlagið at útrokna sum tað 1. juli 1975 útroknaða prístalsgrundarlag, faldað við galdandi prístali og deilt við 100.

skiner, inventar og andet driftsmateriale, dog kun i det omfang, hvori disse udgifter tjener til udbedring af slitage og beskadigelse fremkommet efter erhvervelsestidspunktet,

c) beløb, som ved rederi- eller fangstvirksomhed på havet henlægges til klassefikation og vedligeholdelse af skibe. Disse henlæggelser kan ialt højst andrage 10% af den første 1.000.000 kr. af anskaffelsesværdien og 5% af anskaffelsesværdien over 1.000.000 kr. og skal indtægtsføres senest 4. indkomstår efter henlæggelsesåret eller det år, skibet afhændes,

d) årlig afskrivning i henhold til særlig lov. Afskrivning for personer må dog ikke være større, end at den skattepligtige indkomst er mindst lige så stor som leveomkostningerne efter det til enhver tid gældende pristalsgrundlag. Fra og med 1. januar 1976 gældende fra og med indtægtsåret 1975 bliver pristalsgrundlaget at udregne som det pr. 1. juli 1975 udregnede pristalsgrundlag ganget med det gældende pristal og divideret med 100.

**32. gr.** Annars skulu, tá inntøkan verður uppgjørd, dragast frá útreiðslur til royndar- og granskingarvirksemi, sum hin skattskyldugi hevur havt, áðrenn sjálv vinnan er byrjað. Hes-

**Prg. 32.** Ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst kan fradrages udgifter til forsøgs- og forskningsvirksomhed, som den skattepligtige har afholdt, før erhvervet er påbegyndt. Fra-

ar útreiðslur kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni tað árið, vinnan er byrjað, og tey næstu 3 inntøkuárini. Hin skattskyldugi ger sjálvur av, hvussu stórur partur av útreiðslunum verður drigin frá inntøkuni hvørt árið sær. Útreiðslur til royndar- og granskingarvirksemi í sambandi við ráevni í undirgrundini koma ikki undir hesar reglur.

**33. gr.** Annars skal, tá inntøkan verður uppgjørd, dragast frá

1) renta av íløgu- og rakstrarskuld í sambandi við vinnuvirki

2) tá ið skattgjaldari veitir lán til eitt virki við vinnuligum endamáli ella gevur ábyrgd til banka ella annan áognara fyri vinnuvirki og av hesi orsøk er fyri tapi, er honum loyvt at draga hetta tap frá í skattskyldugu inntøkuni, sbr. nr. 6,

3) avseting til rakstrargrunn hjá teimum í 1. gr., nr. 8, 11, 12 og 13 umrøddu feløgum. Henda avseting kann í mesta lagi vera 15% av skattskyldugari inntøku áðrenn avseting til fløgugrunn, tó í mesta lagi 500.000 kr. um árið. Henda avseting skal í seinasta lagi fimta inntøkuárið aftan á avsetingarárið inntøkuførast aftur,

4) útreiðslur til ferðing, lýsingar o.t., sum í sambandi við vinnuvirki standast av at selja vørur og tænastur í inntøkuári-

dragene kan dog først foretages i det indkomstår, hvori erhvervet er påbegyndt, og de næste tre indkomstår. Den skattepligtige afgør selv, hvor stor en del af udgiften, der skal fradrages de enkelte år. Udgifter til forsøgs- og forsknings-virksomhed i forbindelse med råstoffer i undergrunden undtages fra denne regel.

**prg. 33.** løvrigt fradrages ved indkomstopgørelsen,

1) renter af investerings- og driftsgæld i forbindelse med erhvervsvirksomhed,

2) når en skatteyder yder lån til eller afgiver kaution overfor bank eller anden kreditor for en erhvervsvirksomhed og lider tab herved, kan dette tab fradrages i hans skattepligtige indkomst jfr. nr. 6.

3) henlæggelser til driftsfond for de i prg. 1, nr. 8, 11, 12 og 13 omhandlede selskaber. Denne henlæggelse kan højst andrage 15% af den skattepligtige indkomst før henlæggelse til investeringsfond, dog højst 500.000 kr. om året. Denne henlæggelse skal indtægtsføres senest femte indkomstår efter henlæggelsesåret.

4) udgifter til rejser, reklame og lignende i forbindelse med erhvervsvirksomhed med det formål at opnå salg af varer og

num og seinni inntøkuár,

5) útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í sambandi við lántøku ella á-byrgd,

6) um so er, at skattauppgerðin eitt ár vísir hall, kann hetta verða drigið frá í skattskyldugu inntøkuni 4 tey næstu árini og soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um inntøka er til tess, og annars so nógv, sum inntøka er til. Hall í sambandi við trotabúgv, gjaldsteðg o.t. verður tó bert loyvt frádrigið í tann mun, skuldin ella partur av henni er goldin. Tann goldni parturin kann tá dragast frá í gjaldingarárinum.

7) hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, fólka-, avlamis-, einkju- og aðra pensjón, ein løntakarafrádráttur, sum er 2.000 kr., um inntøkan er undir 10.000 kr., tó í mesta lagi ájavnt við inntøkuna. Er inntøkan 10.000 kr. ella hægri, er frádrátturin 20% av inntøkuni, tó hægst 4.000 kr. Hava bæði maður og kona inntøku, eiga bæði rætt til frádráttin. Frá og við 1. oktober 1979 verður løntakarafrádrátturin uppá 4.000 kr. prístalsviðgjørdur við prístalin-

tjenester i det pågældende og senere indkomstår,

5) udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med optagelse af lån eller kaution,

6) såfremt den for et indtægtsår opgjorte skattepligtige indkomst udviser underskud, kan dette fradrages i den skattepligtige indkomst for de nærmest efterfølgende fire indkomstår, således at hele underskuddet fradrages det første år, såfremt det kan dækkes af indtægten dette år, og ellers så stor en del, der er dækning for.

Underskud i forbindelse med konkurs, betalingsstandsning og lignende, kan dog kun fradrages i den udstrækning, gælden eller dele af denne er betalt. Det således indbetalte beløb kan fradrages i det år, betalingen har fundet sted.

7) hos personlig skattepligtige, som oppebærer lønindtægt, herunder indtægt ved partsfiskeri, folke-, invalide-, enke- og anden pension et lønmodtagerfradrag, som er kr. 2.000, hvis indtægten er mindre end kr. 10.000, fradraget kan dog ikke overstige indtægtsbeløbet. Er indtægten kr. 10.000 eller mere, kan fradrages 20% af indtægtsbeløbet, dog højst kr. 4.000. Oppebærer både mand og hustru disse her omhandlede indtægter, er begge berettigede til fradraget. Fra og med 1. oktober 1979 bliver løn-

um pr. 1. oktober 1978 sett til 100. Broytingin í lønfakarafrádráttinum verður útroknað hvønn 1. oktober og kunngjørd av Líkningarráð Føroya sum galdandi fyri komandi inntøkuár,

8) hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, neyðugar útreiðslur í sambandi við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í a)-g).

a) Útreiðslur til ferðing við bili millum bústað og arbeiðsstað verða loyvdar frádrignar við ávísari upphædd fyri hvønn koyrdan kilometur.

b) Kann almenn ferðsla verða nýtt í staðin, verður frádráttur loyvdur ájavnt við ferðakostnaðin við almenna ferðasambandinum.

c) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað sjóvegis verður frádráttur loyvdur ájavnt við útreiðslur, men tó ongantíð meira enn svarandi til ferðakostnaðin við almennum ferðasambandi. Útreiðslurnar sambært reglunum í a)-c) verða tó bert loyvdar frádrignar í tann mun, samanlagda upphæddin fer upp um eina ávísa upphædd, sbr. g).

d) Fyri ferðing millum bústað í Føroyum og arbeiðsstað uttanlands verður frádráttur loyvdur sambært skjalprógvaðum útreiðslum. Útreiðslurnar verða tó bert loyvdar frádrignar í tann

modtagerfradraget på kr. 4.000 at regulere med pristallet pr. 1. oktober 1978 sat lig med 100. Ændringer i lønmodtagerfradraget udregnes hver den 1. oktober og offentliggøres af Líkningarráð Føroya som gældende for det efterfølgende år,

8) hos en person, der har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri, nødvendige udgifter i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads efter reglerne i a)-g).

a) Udgifter til befordring med bil mellem bopæl og arbejdsplads kan fratrækkes med et fast beløb for hver kørt kilometer.

b) såfremt offentlig befordring kan benyttes, tillades fradrag med samme beløb, som udgiften til offentlig befordring.

c) For befordring ad søvejen mellem bopæl og arbejdsplads tillades fradrag for udgiften, dog aldrig mere end befordringsudgiften med offentlig befordring. Kun den del af udgifterne efter reglerne i a)-c), der overstiger et nærmere fastsat beløb, jfr. g), kan fradrages.

d) For befordring mellem bopæl på Færøerne og en i udlandet beliggende arbejdsplads kan dokumenterede befordringsudgifter fradrages. Kun den del af udgifterne, der overstiger før-

mun, samanlagda upphæddin fer upp um fyrrnevndu ávísu upphædd sbr. g).

e) Giftur persónur, sum flytur í aðra kommunu at arbeiða har, fær frádrátt fyri dupult húsargald, soleiðis at loyvdur verður ein ávísur mánaðarligur frádráttur fyri leigu av høli og ein ávísur frádráttur um dagin fyri eykaútreiðslur til kost. Útreiðslurnar verða tó bert loyvdar frádrignar í tann mun, samanlagda upphæddin fer upp um fyrrnevndu ávísu upphædd sbr. g).

f) Persóni, sum við loyvi frá landsstýrinum hevur útvegað sær avlamisakfar eftir reglunum í løgtingslóg um innflutningsgjald, og sum nýtir avlamisakfarið til ferðing millum bústað og arbeiðsstað, verður umframt frádráttirnar í a)-e) loyvdur ein fastur frádráttur uppá 6.000 kr. um árið, tó í mesta lagi ájavnt við lønarinntøkuna. Frá og við 1. oktober 1982 verður frádráttsurin pristalsviðgjørdur við pristalinum 1. oktober 1981 sett til 100.

g) Tær føstu upphæddir, ið nevndar eru í a)-e), verða ásettar av líkningarráðnum í seinasta lagi 1. oktober, galdandi fyri komandi inntøkuár.

9) uppihaldspeningur til hjúnafelaga skattgjaldarans, skildan ella sundurlisnan, ella til børn uttan fyri hjúnalag yngri enn 18 ár, og sum tað almenna hevur álagt honum at hjálpa ella lata

nævnte, nærmere fastsatte beløb, jfr. g), kan fradrages.

e) En gift person, der flytter i en anden kommune end bopælkommunen for at arbejde der, kan få fradrag for dobbelt husførelse, således at der tillades et fast månedligt fradrag for leje af værelse og et fast fradrag om dagen for merudgifter til kost. Kun den del af udgifterne, der overstiger førnævnte faste beløb (jfr. g), kan fradrages.

f) En person, der med landsstyrets tilladelse har erhvervet sig en invalidebil efter regler i lagtingslov om indførselsafgifter, og som benytter denne i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads, tillades udover fradragene under a)-e) et fast fradrag på kr. 6.000 om året, dog højst det der svarer til lønindtægten. Fra og med 1. oktober 1982 bliver fradraget pristalsreguleret med pristallet pr. 1. oktober 1981 sat til 100.

g) De i a)-e) omtalte nærmere fastsatte beløb fastsættes af ligningsrådet senest 1. oktober som gældende for det kommende år.

9) underholdsbidrag til den skattepligtiges fraskilte eller fraseparerede ægtefælle eller til børn uden for ægteskab, der ikke er fyldt 18 år, med hensyn til hvilke der påhviler den skatte-

uppihaldspening til, og sum ikki búgva hjá uppihaldsskylduga. Bert undirhaldspeningur fyri tíðina, til barnið fyllir 18 ár, kann dragast frá. Hesin peningur er skattskyldug inntøka hjá barninum. Tá hjún í royndum liva hvørt sær á slíkan hátt, at skilnaður ber við sær, at konan verður sjálv skattskyldug, verður farið fram, sum vóru tey skild til borð og song,

10) útreiðslur til onnur leypandi gjøld til persónar, ið búgva her á landi, sum t.d. hald og uppihaldspeningur, ið skattgjaldarin hevur bundið seg til at reiða út, tó bert um tey eru at rokna fyri viðurlag fyri fíggjarliga veiting, ið skattgjaldarin hevur fingið, tá skuldbindingin varð stovnað.

**34. gr.** Tá skattskylduga inntøkan hjá giftari kvinnu verður uppgjørd eftir 4. gr. 2. og 3. stk., skulu frá inntøkuni verða dignar tær útreiðslur, sum í árinum ganga til at vinna nevndu inntøkur, tryggja tær og halda teimum við sbr. 31. og 33. gr.

*2. stk.* Skattligar avskrivingar av ognarlutum, sum verða nýttir í vinnuvirki hjá øðrum hjúnafelaganum, verða gjørdar av hesum, hetta uttan mun til, um hann sjálvur ella hin hjúnafelagin er ánari.

*3. stk.* Flytur annar hjúnafel-

pligtige forsørger eller bidragspligt over for det offentlige, og som ikke opholder sig hos bidragyderen. Kun bidrag for tiden indtil barnets fyldte 18 år kan fradrages. Bidragene medregnes til barnets skattepligtige indkomst. Når ægtefæller lever faktisk adskilt fra hinanden under sådanne omstændigheder, at adskillelsen medfører selvstændig skattepligt for hustruen, behandles de i denne forbindelse som separerede,

10) udgifter til andre løbende ydelser til herboende personer, såsom aftægts- og underholdsydelser, som den skattepligtige har forpligtet sig til at udrede, dog kun i det omfang, hvori ydelsen kan anses som vederlag for en ved forpligtelsens stiftelse modtaget økonomisk modydelse.

**prg. 34.** Ved opgørelsen af en hustrus skattepligtige indkomst efter prg. 4, stk. 2 og 3 foretages der fradrag for de udgifter, som i årets løb er anvendt til at erhverve, sikre og vedligeholde indkomsten, jfr. prg. 31 og 33.

*Stk. 2.* Skattemæssige afskrivninger af formuegoder, som anvendes i den ene ægtefælles erhvervsvirksomhed, foretages af denne, uanset om disse goder tilhører den ene eller den anden af ægtefællerne.

*Stk. 3.* Overføres formue-

agin ognir til hin hjúnafelagan til nýtslu í vinnuvirki hansara, skal vinningur ella hall ikki teljast við í skattskyldugu inntøkuni hjá fyrrnevnda.

*4. stk.* Aftan á yvirflyting verða ognirnar avskrivingarliga og viðvíkjandi vinningi/halli viðgjørdar, sum um tær vóru útvegaðar av móttakaranum tá og fyri somu peningahædd, sum tær í sínari tíð vórðu útvegaðar fyri, og verða fyrr gjørdar avskrivingar mettar sum gjørdar av honum.

*5. stk.* Uttan mun til fyriskipanirnar í 3. stk. verða reglurnar í 31. gr. í avskrivingarlógini galdandi, um ognirnar við yvirflyting til hin hjúnafelagan verða fluttar til aðra nýtslu.

goder mellem ægtefæller til benyttelse i erhvervsvirksomhed, skal der hverken medregnes tab eller fortjeneste ved overførslen.

*Stk. 4.* Efter overførsel skal formuegoderne med hensyn til afskrivninger samt vedrørende fortjeneste/tab, behandles, som om de oprindelig var erhvervet af modtageren, og for samme beløb, som de i sin tid var erhvervet for, og skal tidligere foretagne afskrivninger anses som foretaget af denne.

*Stk. 5.* Uden hensyn til bestemmelserne i stk. 3 skal reglerne i prg. 31 i afskrivningsloven anvendes, såfremt formuegoderne ved overførsel til den anden ægtefælle anvendes til andre formål.

**35. gr.** Tá skattskyldug inntøka verður uppgjørd, verður tikin við staðfestur kursvinningur og drigið frá staðfest kurstap av fíggjarkrøvum og skuld í fremmandum gjaldoyra, tá hetta hevur samband við vinnuvirki skattgjaldarans.

*2. stk.* Kursvinningur ella -tap í fremmandum gjaldoyra skal verða tikin við í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni tað árið, vinningurin er staðfestur og tapið goldið.

**prg. 35.** Ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst medregnes realiseret avance og fradrages realiseret tab som følge af kursændringer på fremmed valuta vedrørende fordringer og gæld, der har tilknytning til erhvervsmæssig virksomhed.

*Stk. 2.* Valutakursgevinst og tab skal på fremmed valuta medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst for det indkomstår, hvori gevinsten er konstateret eller tabet betalt.

**36. gr.** Keypsamtøkur, sum eru skattskyldugar sbr. 1. gr. nr. 11, kunnu, tá skattskyldug inntøka

**prg. 36.** Brugsforeninger, som er skattepligtige iflg. prg. 1, nr. 11, kan ved opgørelsen af

verður uppgjørd, draga frá afturberingina, sum verður útgoldin limunum í mun til tað, teir hava keypt av vørum og tænastum.

**37. gr.** Upp í skattskyldugu inntøkuna hjá partafelagi verður ikki taldur vinningur av virðishækking, tá partafelagið gevur út partabrøv ella veksur um partapeningin.

*2. stk.* Um partafelag við heimstaði her á landi, sum er undir ræði móðurfelags við heimstaði uttanlands, í handilsligu og fíggjarligu viðurskiftum sínum við hetta felag er undirgivið øðrum korum, enn sjálvstøðulig fyritøka hevði verið, skal upp í skattskyldugu inntøkuna hjá dótturfelagnum her verða taldur tann vinningur, sum ætlast má, at tað hevði havt, um tað var sjálvstøðug fyritøka, ið óheft gjørdi keyp við móðurfelagið.

den skattepligtige indkomst fradrage dividende, som udbetales medlemmerne i forhold til deres køb af varer og tjenester i foreningen.

**prg. 37.** Til den skattepligtige indkomst for et aktieselskab medregnes ikke overkurs, som et selskab opnår ved udstedelse af aktier eller udvidelse af sin kapital.

*Stk. 2.* Såfremt et på Færøerne hjemmehørende aktieselskab, der kontrolleres af et udenfor Færøerne hjemmehørende moderselskab, i sine handelsmæssige eller økonomiske forbindelser med sidst nævnte selskab er underkastet andre vilkår end dem, som vil gælde for et uafhængigt foretagende, skal til det herværende datterselskabs skattepligtige indkomst henføres den fortjeneste, som det må antages at ville have opnået, hvis det havde været et uafhængigt foretagende, der under frie vilkår afsluttede forretninger med vedkommende moderselskab.

**38. gr.** Rentur av útistandandi skatti og ov seint goldnum skatti annars, ið nevndar eru í 78. og 135. gr., kunnu ikki dragast frá tí skattskyldugu inntøkuni. Rentur av ov nógv goldnum skatti, ið nevndar eru í 79. gr. 3. og 4. stk., skulu ikki teljast við í skattskyldugu inntøkuni.

**prg. 38.** De i prg. 78 og 135 omtalte renter af restskat og for sent betalt skat kan ikke bringes til fradrag i den skattepligtige indkomst. De i prg. 79, stk. 3 og 4 omtalte renter af for meget betalt skat skal ikke medregnes til den skattepligtige indkomst.

**39. gr.** Eftirsitandi hjúnafelagi, sum valt hevur at sita í óskiftum búgvi, ger í tí inntøkuári, sum andlátið var, upp allar inntøkur hjúnanna sum ásett í 13. gr. Verða smb. ásetanini í hesi grein gjørdar tvær álíkningar, verður inntøkuskattur roknaður út eftir hvørjari av hesum álíkningunum sær, og eftirsitandi hjúnafelagin verður síðani at svara skatt við báðum skattaupphæddunum samanløgdum.

**40. gr.** Tá endaliga líkningin hjá tí deyða, jvf. 14. gr. 2. stk. verður gjørd, skulu verða viðtaldar allar inntøkur, sum hann hevur vunnið fram til deyðadagin. Her frøknaðar eru allar A-inntøkur hansara, jvf. 60 gr., eisini tær, sum møguliga ikki verða útgoldnar fyrr enn aftan á deyðsdagin, og allar B-inntøkur fram til deyðsdagin.

*2. stk.* Somuleiðis skal eftirsitandi hjúnafelagi skatta av øllum A-inntøkum sínum í inntøkuárinum og teimum B-inntøkum, sum ikki ganga inn í búgvið.

*3. stk.* Tá inntøkan hjá deyðsbúgvum, ið nevnd eru í 1. gr. nr. 7, verður uppgjørd, skal takast við øll inntøka og allar útreiðslur í tíðini frá deyðadegnum og til tann dagin, tann endaliga uppgerðin av búnum verður gjørd. Um so er, at hetta tíðar-

**prg. 39.** Længstlevende ægtefælle, som har valgt at hensidde i uskiftet bo, hvori dødsfaldet har fundet sted, en opgørelse over ægtefællernes samlede indkomster i henhold til reglerne i prg. 13. Udfærdiges der, i henhold til bestemmelserne i nævnte prg., to påligninger, udregnes indkomstskatten særskilt på grundlag af hver af disse påligninger, og påhviler det derefter længstlevende ægtefælle at svare skat med summen af de beregnede skattebeløb.

**prg. 40.** Ved den afdødes afsluttende påligning i henhold til prg. 14, stk. 2, skal medregnes alle indkomster, som afdøde har erhvervet inden dødsfaldet. Heri medregnet alle A-indkomster i.h.t. prg. 60 samt de A-indkomster, der muligvis ikke er udbetalt før end efter dødsfaldet, samt alle B-indkomster erhvervet inden dødsfaldet.

*stk. 2.* Længstlevende ægtefælle skal ligeledes ansættes til skat af alle sine i indkomståret selverhvervede A-indkomster samt af de B-indkomster, som ikke overgår til boet.

*stk. 3.* Ved opgørelsen af indkomsten for de i prg. 1, nr. 7, nævnte dødsboer medregnes alle indkomster og udgifter i tidsrummet fra dødsfaldet til tidspunktet for den endelige bosopgørelse. Udgør denne periode mindre end 15 måneder, anses

skeið er styttri enn 15 mánaðir, verður tað tá at rokna sum eitt inntøkuskeið.

*4. stk.* Er búgvið ikki skift innan 15 mánaðir, verður tað at lata inn vanliga sjálvuppgávu yvir inntøkur og útreiðslur í inntøkuárinum, jvm. 24. gr. 3. stk., síðsta punktum, soleiðis at fyrsta inntøkuskeið tess verður tíðin frá deyðadegnum og til næsta 31. desember.

*5. stk.* Inntøkuuppgerðin hjá búnum verður í hesum førum at fylgja somu reglum, sum galda fyri skattskyldugar persónar. Tó kann avseting í fløgugrunn ikki verða gjørd.

*6. stk.* Allar ognir í búnum verða avskrivingarliga og viðvíkjandi vinningi/halli viðgjørdar, sum um tær vóru útvegaðar av búnum upprunaliga og fyri somu peningshædd, sum tær í sínari tíð vóru útvegaðar fyri og verða fyrrgjørdar avskrivingar mettar sum gjørdar av búnum. Vinningur og hall, sum koma fram við sølu av ognum í búnum, verða tald við í tann mun, vinningurin ella hallið hevði verið talt við í inntøkuuppgerðini hjá tí deyða, um sølan hevði verið gjørd av honum.

*7. stk.* Tá endaliga uppgerðin hjá búnum smb. galdandi skiftisreglum verður gjørd, skulu tær ognir, sum kunnu avskrivast, og ognir, sum koma undir 27. gr., den for at udgøre en indkomstperiode.

*stk. 4.* Er boskiftet ikke afsluttet inden for 15 måneder fra dødsfaldet, skal boet med henvisning til prg. 24, stk. 3, sidste punktum, indgive selvangivelse over indkomster og udgifter i indkomståret, således at den første indkomstperiode udgør tidsrummet fra dødsfaldet til førstkommende 31. december.

*stk. 5.* Boets indkomstopgørelse skal i disse tilfælde følge samme regler som den gælder for skattepligtige personer. Hensættelse til inventeringsfonds kan dog ikke foretages.

*stk. 6.* Alle boets aktiver skal, med hensyn til afskrivninger samt vedrørende fortjeneste/tab, behandles, som om de oprindelig var erhvervet af boet, og for samme beløb, som de i sin tid var erhvervet for, og skal tidligere foretagne afskrivninger anses som foretaget af denne. Fortjeneste og tab, som fremkommer ved salg af boets aktiver medregnes i den udstrækning, fortjenesten/tabet ville være at medregne i afdødes indkomstopgørelse, dersom salget var foretaget af denne.

*stk. 7.* Ved den i henhold til gældende skiftelov foretagne endelige opgørelse behandles de aktiver, som kan afskrives samt de i prg. 27 omhandlede aktiver,

verða mettar, sum tær eru avhendar uppgerðardagin. Avhending verður her mett sum søla fyri virði í vanligum handli. Somuleiðis skulu í hesi uppgerð allar burturleggingar av einum og hvørjum slag verða tiknar til inntøku aftur.

som om de var afhændet på tidspunktet for boets opgørelse. Afhændelse vil i denne forbindelse være at anse som salg til værdier i handel og vandel. Henlæggelser af enhver art skal indtægtsføres i denne opgørelse.

## 4. kapittul

### Skattur til tilhaldskommunu

**41. gr.** Skyldu at svara skatt til kommununa hava allir persónar og feløg v.m., sum hava skattskyldu til landskassan.

*2. stk.* Skattskyldugir persónar svara skatt til ta kommunu, har teir hava fast tilhald fyri seg og húski sítt 1. oktober í árinum framman undan inntøkuárinum, og feløg v.m. har tey eru skrásett, sbr. tó 48. gr. Uppihaldari, sum flytur í aðra kommunu at arbeiða har, er framvegis einans skattskyldugur í heimakommunu síni, so leingi hann heldur hús í henni.

*3. stk.* Fast tilhald, ið er styttri enn 3 mánaðir, verður ikki í nakrari kommunu roknað fyri at stovna skattskyldu, uttan so at hetta er framhald av føstum tilhaldi á sama stað áður, og skattgjaldarin alt samanlagt hevur hildið til har í 3 mánaðir í minsta lagi. Men hevur persónur ikki í skattaárinum havt 3 mánaða fast tilhald í nakrari kommunu í landinum, tá hava kortini allar kommunur, har hann í skattaárinum hevur fast tilhald, rætt til at skatta hann eftir tí, sum hetta tilhaldið hevur vart, um so er, at tað ikki var styttri enn ein mánað.

*4. stk.* Teir, ið starva í sigling

## Kapitel 4

### Skat til opholdskommunen

prg. 41. Pligt til at svare skat til kommunen påhviler alle personer og selskaber m.v., som er svarer skat til landskassen.

*Stk. 2.* Skattepligtige personer svarer skat til den kommune, hvor de har fast ophold for sig eller sin husstand 1. oktober i året forud for indkomståret, og selskaber m.v., i den kommune, hvor disse er registrerede, jfr. dog prg. 48. Forsørger, som tager ophold i en anden kommune for at søge arbejde, er fremdeles udelukkende skattepligtig i sin hjemstedskommune, så længe han fører husholdning i denne.

*Stk. 3.* Fast ophold af kortere varighed end 3 måneder kommer ikke i nogen kommune i betragtning til begrundelse af skattepligt til denne, med mindre det er en fastsættelse af et tidligere fast ophold sammesteds, og det samlede ophold udgør mindst 3 måneder. I det tilfælde, at en person ikke i skatteåret har haft 3 måneders fast ophold i nogen kommune på Færøerne, er dog enhver kommune, hvori han i indkomståret har haft fast ophold, berettiget til at beskatte ham i forhold til dette opholds varighed, når dette ikke er under een måned.

*Stk. 4.* Personer, der er be-

ella fiskiskapi, verða, um teir hava ikki bústað ella fast tilhald í nakrari kommunu 1. oktober í árinum framman undan inntøkuárinum, skattaðir í teirri kommunu, har ið teir vanliga halda til, tá teir eru ikki á sjónum. Ber ikki til at staðfesta tílíkan vanligan tilhaldsstað, skal skatturin verða goldin í teirri kommunu, skipið hevur heimstað, ella, um skipið eigur heima uttanlands, í teirri kommunu, har sum hesir skattgjaldarar seinast hava verið skattskyldugir til tilhaldskommununa. Í ivamálum hevur landsstýrið ta endaligu avgerðina.

*5. stk.* Persónar, sum í heilum skifta tilhald, gjalda skatt til ta kommunu, sum helst má verða hildin at vera heimakommuna teirra. Í ivamálum hevur landsstýrið ta endaligu avgerðina.

*6. stk.* Deyðsbúgv verður skattað í teirri kommunu, har hin deyði seinast hevði skattskyldu til tilhaldskommununa.

skæftiget ved søfart eller fiskeri, beskattes, såfremt de ikke har bopæl eller fast ophold i nogen kommune, i den kommune, hvori de, bortset fra ophold på søen, har deres sædvanlige opholdssted. Haves sådan tilknytning ikke til nogen kommune, svares skatten til den kommune, i hvilken skibet har sit hjemsted, eller, såfremt skibet har hjemsted uden for Færøerne, til den kommune, hvori de pågældende senest har været skattepligtige til opholdskommunen; i tvivlstilfælde træffer landsstyret den endelige afgørelse.

*Stk. 5.* Personer, som stadig skifter opholdssted, svarer skatten til den kommune, der nærmest må betragtes som deres hjemstedskommune; i tvivlstilfælde træffer landsstyret den endelige afgørelse.

*Stk. 6.* Dødsboer beskattes i den kommune, hvor afdøde senest var skattepligtig til opholdskommunen.

**42. gr.** Hevur persónur tilhald í eini kommunu, av tí at hann er á sjúkrahúsi ella er settur í fangahús ella tílíkt, og uppfyllir hann samstundis tað, sum krevst til at verða settur í tilhaldskommunuskatt í aðrari kommunu í landinum, tá skal hann ikki gjalda tilhaldskommunuskatt í fyrrnevndu kommunu. Hetta sama hevur gildi fyri tann, sum heldur

**prg. 42.** Den, hvis ophold i en kommune skyldes, at han er anbragt på sygehus eller i fængsel, arrest eller lignende, og som samtidig opfylder betingelserne for at blive pålignet opholdskommuneskat i en anden kommune på Færøerne, svarer ikke opholdskommuneskat i førstnævnte kommune. Det samme gælder den, hvis ophold i en

til í eini kommunu, av tí at hann er har í almennum ørindum, og sum samstundis uppfyllir tað, sum krevst til at vera settur í tilhaldskommunuskatt í aðrari kommunu í landinum, uttan tá tað má ætlast, at hann fer at halda til í fyrrnevndu kommunu alt inntøkuárið.

**43. gr.** Bygdar(r)ráðið kann, um tað ikki heldur, at skattakommunan hjá einum skattskyldugum 1. oktober er tann rætta jmt. 41. gr. 2.-6. stk., kæra um hetta áðrenn 1. mei árið eftir. Um hin skattskyldugi er settur í skatt sambært 2. stk., er kærufreistin 5 mánaðir, aftaná at skattskyldan hevur tikið við. Skattaborgarin kann kæra um avgerðina innan 3 mánaðir, aftaná at hann hevur fingið fráboðanina um, til hvørja kommunu hann er tilhaldsskattskyldugur. Um kommunurnar ikki eru samdar um, til hvørja kommunu ein persónur er kommunuskattaskyldugur, ella semja ikki kann fáast við ein persón um hetta, kann spurningurin leggjast fyri landsstýrið. Tó kann skattaborgarin innan 4 vikur aftaná, at hann hevur fingið boð um úrskurð landsstýrisins, kæra til dómsvaldið.

*2. stk.* Um skattskyldan tekur við í álmanakkaárinum, verður skatturin latin til ta kommunu, sum hin skattskyldigi má haldast at hava tað tilhald í, sum

kommune skyldes udførelse af et offentligt hverv, og som samtidig opfylder betingelserne for at blive pålignet opholdskommuneskat i en anden kommune på Færøerne, med mindre opholdet i førstnævnte kommune må forudsættes at ville udstrække sig over hele indkomståret.

**prg. 43.** Kommunalbestyrelsen i en kommune, der mener, at den for en skatteyder udpegede skattekommune per. 1. oktober ikke er den rette, jfr. prg. 41, stk. 2-6, kan inden 1. maj året efter rejse indsigelse herimod. Hvis skatteyderen er ansat til skat efter stk. 2, kan indsigelse rejses indtil 5 måneder efter skattepligtens indtræden. En skatteyder kan rejse tilsvarende indsigelse indtil 3 måneder efter, at der er givet ham underretning om, til hvilken kommune han er skattepligtig. Såfremt der ikke kan opnås enighed mellem kommunerne eller med skatteyderen om, hvilken kommune der skal anses for skattekommune, kan spørgsmålet forelægges landsstyret til afgørelse. Dog kan skatteyderen, inden der er gået 4 uger fra landsstyrets afgørelse, er meddelt ham, rejse sagen ved domstolene.

*Stk. 2.* Ved skattepligts indtræden i kalenderåret svarer skatteyderen indkomstskat til den kommune, som han må vurderes at have den tilknytning til,

til í eini kommunu, av tí at hann er har í almennum ørindum, og sum samstundis uppfyllir tað, sum krevst til at vera settur í tilhaldskommunuskatt í aðrari kommunu í landinum, uttan tá tað má ætlast, at hann fer at halda til í fyrrnevndu kommunu alt inntøkuárið.

**43. gr.** Bygdar(r)ráðið kann, um tað ikki heldur, at skattakommunan hjá einum skattskyldugum 1. oktober er tann rætta jmt. 41. gr. 2.-6. stk., kæra um hetta áðrenn 1. mei árið eftir. Um hin skattskyldugi er settur í skatt sambært 2. stk., er kærufreistin 5 mánaðir, aftaná at skattskyldan hevur tikið við. Skattaborgarin kann kæra um avgerðina innan 3 mánaðir, aftaná at hann hevur fingið fráboðanina um, til hvørja kommunu hann er tilhaldsskattskyldugur. Um kommunurnar ikki eru samdar um, til hvørja kommunu ein persónur er kommunuskattaskyldugur, ella semja ikki kann fáast við ein persón um hetta, kann spurningurin leggjast fyri landsstýrið. Tó kann skattaborgarin innan 4 vikur aftaná, at hann hevur fingið boð um úrskurð landsstýrisins, kæra til dómsvaldið.

*2. stk.* Um skattskyldan tekur við í álmanakkaárinum, verður skatturin latin til ta kommunu, sum hin skattskyldigi má haldast at hava tað tilhald í, sum

kommune skyldes udførelse af et offentligt hverv, og som samtidig opfylder betingelserne for at blive pålignet opholdskommuneskat i en anden kommune på Færøerne, med mindre opholdet i førstnævnte kommune må forudsættes at ville udstrække sig over hele indkomståret.

**prg. 43.** Kommunalbestyrelsen i en kommune, der mener, at den for en skatteyder udpegede skattekommune per. 1. oktober ikke er den rette, jfr. prg. 41, stk. 2-6, kan inden 1. maj året efter rejse indsigelse herimod. Hvis skatteyderen er ansat til skat efter stk. 2, kan indsigelse rejses indtil 5 måneder efter skattepligtens indtræden. En skatteyder kan rejse tilsvarende indsigelse indtil 3 måneder efter, at der er givet ham underretning om, til hvilken kommune han er skattepligtig. Såfremt der ikke kan opnås enighed mellem kommunerne eller med skatteyderen om, hvilken kommune der skal anses for skattekommune, kan spørgsmålet forelægges landsstyret til afgørelse. Dog kan skatteyderen, inden der er gået 4 uger fra landsstyrets afgørelse, er meddelt ham, rejse sagen ved domstolene.

*Stk. 2.* Ved skattepligts indtræden i kalenderåret svarer skatteyderen indkomstskat til den kommune, som han må vurderes at have den tilknytning til,

umrøtt er í 41. gr. Um skattskyldan tekur við í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 31. desember í eini kommunu, verður skattur fyri komandi álmanakkaárið eisini goldin til hesa kommunu.

som omtalt er i prg. 41. Indtræder skattepligten i tiden fra den 1. oktober til den 31. december, svares også indkomstskat for det følgende kalenderår til denne kommune.

**44. gr.** Flytur skattgjaldarin úr skattakommununi í inntøkuárinum, skal skattakommunan lata ein part av tí kommunuskatti, sum er álíknaður fráflutta skattgjaldaranum, til tilflytingarkommununa. Hetta er bert galdandi um fasta tilhaldið í tilflytingarkommununi sambært 41. gr. varir í minsta lagi 3 mánaðir samfelt.

**prg. 44.** Fraflytter en skatteyder skattekommunen, skal skattekommunen afgive en andel af den kommunale indkomstskat, der er pålignet skatteyderen, til tilflytningskommunen. Det gælder dog kun, såfremt bopælen i tilflytningskommunen, jfr. prg. 41, bevares i mindst 3 sammenhængende måneder.

*2. stk.* Skatturin verður býttur lutfalsliga í mun til tað tíðarskeið, skattgjaldarin hevur búð í tilflytingarkommununi. Hesin lutfalsligi partur verður roknaður frá byrjanini av tí fjórðingsári, sum kemur beint aftan á tilflytingina, og til endan av tí fjórðingsári, tá ið møgulig fráflyting aftur fer fram, samanber 1. stk. Hendir flyting 1. í einum fjórðingsári, so er hesin dagur at meta sum fráflytingardagur.

*Stk. 2.* Skatten deles forholdsmæssigt på grundlag af den periode, hvori skatteyderen har haft bopæl i tilflytningskommunen. Ved fastsættelsen af den forholdsmæssige andel regnes periodens varighed fra begyndelsen af det kvartal, der følger efter flytningen, og indtil udgangen af det kvartal, hvori der eventuelt sker fraflytning jfr. stk. 1. Varigheden regnes dog fra flyttedagen, såfremt flytningen sker den 1. i et kvartal.

*3. stk.* Flytur skattgjaldari burtur úr Føroyum, skal hann, til skattskyldan heldur uppat, gjalda skattin til ta kommunu, sum hann var skattskyldugur í, tá hann flutti burtur. Men um skattgjaldarin eftir tað, at hann læt bústað sín frá sær, framveg-

*Stk. 3.* Såfremt en skatteyder opgiver sin bopæl på Færøerne, svares skatten, indtil skattepligten ophører, til den kommune, hvortil han ved bortrejsen var skattepligtig. Såfremt den skattepligtige efter bopælens opgivelse vedblivende er skatte-

is er skattskyldugur her á landi sambært 1. gr. nr. 5, tá verða reglurnar í 41. gr. 3. stk. nýttar.

**45. gr.** Kommuna, sum ikki metir seg at hava fingið sín part av kommunuskattinum sbr. 44. gr. 2. stk., ella ikki metir býtið av kommunuskattinum hjá einum persóni millum kommunurnar at vera rættan, kann í seinast lagi 1 ár og 3 mánaðir, aftaná tað álmanakkaárið er úti, ið kært verður um, senda kæru um hetta til skattakommununa við upplýsingum um tað tíðarskeiðið, skattaborgarin hevur búð í kommununi. Um kommunurnar ikki verða samdar um, hvør skal hava skattin, ella um býtið av honum, hevur líkningarráðið ta endaligu avgerðina. Líkningarráðið ger nærri reglur fyri, hvussu býti av upphæddini millum kommunurnar verður útroknað.

**46. gr.** Kommunuskatturin verður álíknaður av somu inntøku, sum nýtt verður, tá landsskatturin verður álagdur.

a) líkningarvaldið metir inntøkuna til eina peningshædd, sum er í minsta lagi 25% hægri, enn nevndin veit um ella ætlar. Verður inntøkan ætlað, verður hon í minsta lagi sett 25% hægri, enn hon var sett til skattaárið frammanundan. Verður fullfíggjað sjálvuppgáva latin inn, aftaná at innsendingarfreistin er er úti, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 1% fyri hvønn dag, ið er liðin, frá tí at innsendingarfreistin gekk út, tó í mesta lagi við 10%. Hækkingin skal í minsta lagi verða 100 kr. og í mesta lagi 5.000 kr. Landsstýrið kann, har serligar umstøður tala fyri, heilt ella partvíst eftirgeva hækkingina.

b) Verður í rættari tíð fyri líkningarvaldinum mælt í móti metingini til skatt, tá kann hon

**prg. 104.** Hvor rettidig og behørig selvangivelse af indkomsten i overensstemmelse med foranstående ikke foreligger, forholdes på følgende måde:

a) Indkomsten ansættes af ligningsmyndigheden til et beløb, der er mindst 25% højere end ligningsmyndigheden bekendt eller af ligningsmyndigheden skønnet. Ansættes indkomsten skønsmæssigt, anslås den mindst 25% højere end for det foregående skatteår. Fremkommer behørig selvangivelse, efter at indleveringsfristen er udløbet, bliver den samlede indkomstskat forhøjet med 1% for hver dag, hvormed indsendelsesfristen er oversiddet, dog højst med 10%. Forhøjelsen skal mindst andrage 100 kr. og højst 5.000 kr. Landsstyret kan, hvor særlige omstændigheder taler derfor, helt eller delvis eftergive forhøjelsen.

b) Gøres der rettidig indsigel-
e overfor ligningsmyndigheden
nod den foretagne ansæ telse,

bert verða lækkað í tann mun, hin metta inntøkan er hægri enn hin veruliga inntøkan, hækkað við teimum prosentum, ið tilskilað eru í a). Sama er galdandi, um avgerð líkningarnevndarinnar verður skotin til landsskattanevndina.

c) Verður tann metingin, ið varð gjørd, tá skattur var álagdur, skotin til landsskattanevndina, uttan at mælt er í móti álíkningini í rættari tíð, sum sagt er í b), tá kann metingin bert verða lækkað í tann mun, hon er meira enn hin veruliga inntøkan hækkað við 30%, um so er, at kæran ikki verður afturrikin samb. 98. gr. 4. stk.

kan ansættelsen kun nedsættes i det omfang, hvori den overstiger den virkelige indkomst, forhøjet med de under a) angivne procenter. Det samme gælder, hvis ligningsmyndighedens ansættelse derefter påklages til landsskatteudvalget.

c) Påklages den ved ligningen foretagne ansættelse for landsskatteudvalget, uden at der som under b) nævnt rettidig har været rejst indsigelse mod ligningen, kan ansættelsen, for såvidt klagen ikke i medfør af prg. 98, stk. 4, helt afvises, kun nedsættes i det omfang, hvori den overstiger den virkelige indkomst med tillæg af 30%.

**105. gr.** Líkningarráðið kann gera reglur um, at persónar, feløg og onnur, sum hava roknskaparskyldu, kunnu fáa freistina við at lata inn sjálvuppgávu longda.

*2. stk.* Kommunala líkningarvaldinum er heimilað, tá serligar grundir eru til tess, at leingja freistina, sum sambært 1. stk. er sett av líkningarráðnum.

*3. stk.* Tær avleiðingar, ið nevndar eru í 104. og 119. gr., 2. stk., og sum standast av tí, ikki at lata inn sjálvuppgávu av inntøku ella ogn, ella av ikki rættstundis at lata inn roknskap, hevur líkningarráðið heimild til at lina ella heilt lata falla burtur, tá skattgjaldarin

**prg. 105.** Ligningsrådet kan lave bestemmelser om, at personer, selskaber og andre, der er regnskabspligtige, kan få fristen til at indsende selvangivelsen forlænget.

*stk. 2.* Den kommunale ligningsmyndighed har bemyndigelse til, når særlig begrundelse herfor foreligger, at forlænge de frister, som iflg. stk. 1 er sat af ligningsrådet.

*stk. 3.* De i prg. 104 og prg. 119, stk. 2, nævnte følger af manglende selvangivelse af indkomst eller formue eller af ikke rettidig indsendelse af regnskab kan lempes eller helt bortfalde efter bestemmelse af ligningsrådet, når den skattepligtige indgiver andragende herom

søkir um tað og til undanførslu hevur grund, sum ráðið telur fullgóða.

**106. gr.** Er skattgjaldari settur í skatt eftir reglunum í 103. og 104. gr., av tí at hann hevur ikki latið inn gilda sjálvuppgávu av inntøkuni, og verður tað seinni upplýst, at veruliga inntøka hansara hevur verið størri enn ætlaða, tá skal hann aftaná gjalda tvífaldan tann inntøkuskatt, sum í vantar, um so er, at hann er ikki sekur til revsingar sambært 139. gr.

**107. gr.** Líkningarráðið kann gera reglur um, at persónur, sum ikki hevur havt inntøku í álmanakkaárinum, bert kann lata kommunala líkningarvaldinum eina undirskrivaða váttan um hetta. Oyðubløð til slíkar váttanir verða gjørd av líkningarráðnum. Annars galda her somu freistir, sum eru galdandi fyri innlating av sjálvuppgávuni smb. 100. gr. 3. stk., jmt. 106. gr.

**108. gr.** Børn, sum við byrjan inntøkuársins ikki hava fylt 16 ár, hava ikki skyldu at lata inn sjálvuppgávu, um tey ikki hava inntøkur av slíkum slag, sum umrøddar eru í 5. gr. 1. stk.

med angivelse af en efter rådets skøn fyldesgørende undskyldningsgrund.

**prg. 106:** Oplyses det senere i tilfælde, hvor gyldig selvangivelse af indkomsten eller formuen ikke foreligger, og hvor ansættelsen er foretaget i overensstemmelse med de i prg. 103 og 104 fastsatte regler, at den pågældende skatteyders virkelige indkomst har oversteget den ansatte indkomst, skal den for lidt erlagte indkomstskat, forsåvidt strafansvar i medfør af prg. 139 ikke er forskyldt, efterbetales med det dobbelte beløb.

**prg. 107.** Ligningsrådet kan udfærdige bestemmelser om, at en person, der i kalenderåret ikke har haft indkomst, kun skal indgive en underskrevet bekræftelse på dette til de kommunale ligningsmyndigheder. Skemaer til disse bevis udarbejdes af ligningsrådet. Samme frister, som er gældende med hensyn til indgivelse af selvangivelsen iflg. prg. 100, stk. 3, jvf. prg. 106 gælder også i dette tilfælde.

**prg. 108.** Børn, der ved begyndelsen af indkomståret ikke er fyldt 16 år, er ikke pligtige at indgive selvangivelse, medmindre de har haft indkomst af den art, som er omtalt i prg. 5, stk. 1.

**109. gr.** Hevur gift kvinna havt inntøku í inntøkuárinum av teimum sløgum, ið nevnd eru í 4. gr., 2. stk., skal hon sjálv lata inn sjálvuppgávu av inntøkum sínum sambært reglunum í hesum kapitli.

*2. stk.* Sambúgvandi hjúnafelagin hevur rætt til at gera seg kunnugan við sjálvuppgávuna hjá hinum hjúnafelagnum, áðrenn hon verður latin líkningarvaldinum. Eisini hevur líkningarvaldið skyldu til, um biðið verður um tað, at lata hjúnafelaga fáa upplýsingar um inntøkuna og skattaútrokningina hjá hinum hjúnafelagnum.

*3. stk.* Hjúnafelagar kunnu, sambært vanligu reglunum um kæru, kæra um skattsetingina hvørt hjá øðrum, og um at annar teirra ikki er settur í skatt. Tá so er, skal tann hjúnafelagi, sum kært er um, fáa høvi til at koma við nærri upplýsingum og prógvførslu, áðrenn nakar úrskurður verður gjørdur.

**prg. 109.** Har en gift kvinde i indkomståret haft indtægter af dem i prg. 4, stk. 2 nævnte art, skal hun indgive egen selvangivelse over disse indtægter i overensstemmelse med reglerne i dette kapitel.

*stk. 2.* Samlevende ægtefæller har ret til at blive gjort bekendt med hinandens selvangivelse i udfyldt stand, forinden den indsendes til ligningsmyndigheden. Ligningsmyndighederne har også pligt til efter anmodning at give samlevende ægtefæller oplysninger om hinandens indkomst og skatteberegning.

*stk. 3.* Enhver af ægtefællerne kan i overensstemmelse med de regler, der gælder herom, klage over den anden ægtefælles ansættelse, eller over, at ansættelsen ikke har fundet sted. I sådanne tilfælde skal den anden ægtefælle få adgang til at give nærmere oplysninger og fremlægge beviser, før der tages nogen beslutning af skattemyndighederne vedrørende ansættelsen.

**109.** gr. Hevur gift kvinna havt inntøku í inntøkuárinum av teimum sløgum, ið nevnd eru í 4. gr., 2. stk., skal hon sjálv lata inn sjálvuppgávu av inntøkum sínum sambært reglunum í hesum kapitli.

*2. stk.* Sambúgvandi hjúnafelagin hevur rætt til at gera seg kunnugan við sjálvuppgávuna hjá hinum hjúnafelagnum, áðrenn hon verður latin líkningarvaldinum. Eisini hevur líkningarvaldið skyldu til, um biðið verður um tað, at lata hjúnafelaga fáa upplýsingar um inntøkuna og skattaútrokningina hjá hinum hjúnafelagnum.

*3. stk.* Hjúnafelagar kunnu, sambært vanligu reglunum um kæru, kæra um skattsetingina hvørt hjá øðrum, og um at annar teirra ikki er settur í skatt. Tá so er, skal tann hjúnafelagi, sum kært er um, fáa høvi til at koma við nærri upplýsingum og próvførslu, áðrenn nakar úrskurður verður gjørdur.

**prg. 109.** Har en gift kvinde i indkomståret haft indtægter af dem i prg. 4, stk. 2 nævnte art, skal hun indgive egen selvangivelse over disse indtægter i overensstemmelse med reglerne i dette kapitel.

*stk. 2.* Samlevende ægtefæller har ret til at blive gjort bekendt med hinandens selvangivelse i udfyldt stand, forinden den indsendes til ligningsmyndigheden. Ligningsmyndighederne har også pligt til efter anmodning at give samlevende ægtefæller oplysninger om hinandens indkomst og skatteberegning.

*stk. 3.* Enhver af ægtefællerne kan i overensstemmelse med de regler, der gælder herom, klage over den anden ægtefælles ansættelse, eller over, at ansættelsen ikke har fundet sted. I sådanne tilfælde skal den anden ægtefælle få adgang til at give nærmere oplysninger og fremlægge beviser, før der tages nogen beslutning af skattemyndighederne vedrørende ansættelsen.

## 11. kapittul

### Ognaruppgerðin

**110. gr.** Øll, sum eru undir skattskyldu til inntøkuskatt eftir hesi lóg, hava við teimum undantøkum og avmarkanum, ið settar eru niðanfyri, skyldu til at lata líkningarráðnum fullfíggjað yvirlit yvir allar ognir og fíggjarlig rættindi síni við tilskilan av virðinum.

Hesar ognir og rættindi eru millum annað:

1) fastognir (grundøki við húsum ella uttan, eins og hús á annara manna øki),

2) før,

3) vørur, ráevni, maskinur, innbúgv, innistøða og leysafæ, ið nýtt er í vinnu,

4) motorakfør, flogfør, ross og hestavognar, ið skattgjaldari nýtir sjálvur,

5) peningur og peningagildi, útistandandi skuldir, skuldabrøv, inniogn í banka, sparikassa ella aðrari peningastovnan, partabrøv, lutaprógv og aðrir partar í feløgum, somuleiðis lista- og frímerkjasavn eins og skartgripir, tá ið virðið teirra er meira enn 25.000 kr.

6) verulig forrættindi, rættur til at fáa landskyld, arvafestigjald eins og onnur støðug rættindi, ið eru avhendilig.

*2. stk.* Til ogn í deyðsbúgvi, sum er tikið til almenna skiftis-

## Kapitel 11

### Formueopgørelsen

**prg. 110.** Alle, som er undergivet pligt at svare indkomstskat i medfør af nærværende lov, er med de undtagelser og begrænsninger, som er anført nedenfor, pligtige at tilstille ligningsrådet udførlig oversigt over alle deres ejendele og økonomiske rettigheder med angivelse af værdien. Disse ejendele og rettigheder udgør blandt andet:

1) fast ejendom (grund med eller uden bygninger foruden bygninger på fremmed grund),

2) fartøjer,

3) varer, råstoffer, maskiner, inventar, besætning samt erhvervsmæssigt benyttet løsøre,

4) privat benyttede motorkøretøjer, flyvemaskiner, heste og hestekøretøjer,

5) penge og pengerepræsentativer, udestående fordringer, obligationer, indestående i banker, sparekasser eller andre pengeinstitutter, aktier, andelsbeviser, andre selskabsandele samt kunst- og frimærkesamlinger og smykker, for så vidt disse sidste overstiger en værdi af 25.000 kr.

6) reelle privilegier, ret til at oppebære jordskyld, arvefæsteafgift samt andre vedvarende, overdragelige rettigheder.

*stk. 2.* Som formue for dødsboer, der er undergivet offentlig

viðgerð her á landi, teljast allar ognir eftir hin deyða, tílíkar sum omanfyri nevndar, sum eru tiknar til skiftis, tá ognin verður uppgjørd, soleiðis at við ognarmetingina verða ikki tald við øll virði, sum áður eru útlutað arvingum búsins.

*3. stk.* Letur persónur ikki inn sjálvuppgávu av 'ogn síni í rættari tíð, soleiðis sum fyriskipað er í 100. gr. 6. stk., og 110 gr., 1. stk., ger tað sjálvuppgávu hansara av inntøkuni til einkis. Líkningarráðið broytir tá ta av tí kommunala líkningarvaldinum gjørdu álíkning eftir reglunum í 104. gr.

skiftebehandling på Færøerne, betragtes samtlige afdødes efterladenskaber af ovennævnte art, som på tidspunktet for formuens opgørelse er inddraget under skiftet, således at der ved ansættelsen bortses fra alle tidligere til boets arvinger udloddede værdier.

*stk. 3.* Undlader en skatteyder at indsende selvangivelse over formuen indenfor de fastsatte frister, således som foreskrevet i prg. 100, stk. 6, og prg. 110, stk. 1, medfører dette, at selvangivelsen af indkomsten ikke bliver taget til følge. Ligningsrådet foretager derefter ændring i den af den kommunale ligningsmyndighed foretagne indkomstansættelse efter reglerne i prg. 104.

**111. gr.** Við meting av ognum verður farið eftir hesum reglum:

1) Meting av fastogn skal fara fram eftir virðinum í vanligum handli. Tá fastognin verður mett, skulu umframt grundøki og hús teljast við øll føst verk eins og múr- og naglfastur útbúnaður og tey rættindi og lunnindi, sum ognini fylgja. Tá víkur at landbúnaði, verður harumframt talt við alt, sum liggur niðurfyri av sáð- og fóðurevnum, tá uppgjørt verður, í tann mun hetta ikki er meira enn tað, sum tørvar til at halda ognina í góðum rakstrarstandi. Við met-

**prg. 111.** Ved værdiansættelsen af formuen anvendes følgende regler:

1) Fast ejendom ansættes til værdien i handel og vandel. Ved ansættelsen af ejendommens værdi medtages foruden grund og bygninger alle faste anlæg samt mur- og naglefast tilbehør og de til ejendommen knyttede rettigheder og herligheder. For landbrugsejendomme medtages endvidere de på opgørelsestidspunktet foreliggende beholdninger af udsæd og foderstoffer i det omfang, disse ikke overstiger, hvad der er fornødent til at holde ejendommen i behørig

ing av hagajørð verður haga-seyðurin viðtaldur, uttan tað sum er kenning. Eftir tilmæli frá líkningarráðnum ger landsstýr-ið, tá ið tað verður hildið neyð-ugt, líkningarvaldunum gjøllari leiðbeiningar viðvíkjandi hvørj-um meginreglum, tey skulu fylgja, og hvørja atferð tey skulu hava við fastognameting.

2) Skip skulu verða mett eftir søluvirði teirra. Við metingina verður serstakliga farið eftir, hvussu høgt skipið er tryggjað; men um keypsvirðið er hægri, tá avskrivingar, ið eru góðkendar í inntøkuuppgerðini, eru frá-drignar, verður farið eftir hes-um virðinum.

3) Vørur, ráevni, hálv- og fullvirkaðar vørur skulu verða sett til sama virði, sum nýtt er, tá hin skattskylduga inntøkan verður uppgjørd, sbr. 26. gr. 3. stk. Í landbúnaði verða sáð og fóðurevni á goymslu einans mett serstakliga, tá ið tey eru meira enn tað, sum tørvar til at halda ognina í góðum rakstri, sbr. nr. 1.

4) Maskinur, innbúgv og onn-ur rakstraramboð, sum eftir reglunum í løgtingslóg um skatt-ligar avskrivingar v.m. koma undir skattfrælsa avskriving, verða mett til keypsvirði, tá

driftstilstand. Ved ansættelsen af værdien af jord i haugen medtages de på haugen gående får, med mindre fårene er sær-eje. I det omfang, hvor det findes påkrævet, udfærdiger landsstyret efter ligningsrådets indstilling nærmere anvisninger til ligningsmyndighederne an-gående principperne for og den nærmere fremgangsmåde ved ansættelsen af fast ejendoms værdi.

2) Skibe ansættes efter deres salgsværdi. Som vejledning for ansættelsen tjener særlig skibets forsikringssum eller, såfremt anskaffelsesværdien med fra-drag af over indkomsten god-kendte afskrivninger er højere, denne sidste værdi.

3) Varer, råstoffer, hel- og halvfabrikata ansættes til sam-me værdi, som benyttes ved op-gørelsen af den skattepligtige indkomst, jfr. prg. 26, stk. 3. En landbrugsejendoms behold-ning af udsæd og foderstoffer ansættes kun særskilt i det om-fang, hvori sådanne beholdnin-ger overstiger, hvad der er for-nødent til at holde ejendommen i behørig driftstilstand, jfr. nr. 1.

4) Maskiner, inventar og andet driftsmateriel, som efter reglerne i lagtingslov om skatte-mæssige afskrivninger kan gøres til genstand for skattefri afskriv-ning, ansættes til anskaffelses-

fyrst skattfrælsar avskrivingar eru frádrignar. Rakstraramboð, sum verða endurnýggjað yvir raksturin, verða mett til 50% av keypsvirðinum.

5) Innistøðan á garðinum verður mett til meðalvirði, sum líkningarráðið setir.

6) Flutningsfør, sum skattgjaldarin nýtir sjálvur, verða mett eftir søluvirðinum.

7) Útistandandi skuldir verða mettar til navnvirði, uttan so at tað má ætlast, at virðið er annað.

8) Virðisbrøv verða mett eftir kursvirði teirra, um so er, at tey verða alment virðismett.

9) Onnur virðisbrøv verða mett eftir navnvirði, uttan so at ætlast má, at tey hava annað virði.

10) Avhendilig forrættindi eins og støðug rættindi, ið eru avhendilig, verða mett eftir ætlaðum søluvirði. Um hesi rættindi heimila støðuga árliga inntøku, verður virðið á teimum mett til 20 ferðir ta árligu inntøkuna.

værdien efter fradrag af de skattefri afskrivninger. Driftsmateriel, som fornyes over driften, ansættes til 50% af anskaffelsesværdien.

5) Den til en landbrugsejendom hørende besætning ansættes til normalværdier, der fastsættes af ligningsrådet.

6) Privat benyttede befordringsmidler ansættes til salgsværdien.

7) Udestående fordringer ansættes efter pålydende, medmindre det skønnes, at værdien er forskellig derfra.

8) Værdipapirer ansættes, forsåvidt de er genstand for offentlig notering efter kursværdien.

9) Andre værdipapirer ansættes efter deres pålydende, medmindre det skønnes, at deres værdi er forskellig derfra.

10) Reelle privilegier samt vedvarende overdragelige rettigheder ansættes til den vederlagssum, der kan påregnes opnået for dem. Hjemler rettigheden en fast årlig ydelse, ansættes dens værdi til det 20-dobbelte af årsydelsen.

**112. gr.** Til ognina verður ikki talt:

1) rættindi, sum eru treytað av nøkrum, ið er óvist,

2) ogn, sum er fingin í arv ella til gávu við tilskilan, at annar fær inntøkurnar fyri

**prg. 112.** Til formuen henregnes ikke:

1) rettigheder, hvis erhvervelse er afhængig af en kendsgerning, hvis indtræden er uvis

2) formue, som er erhvervet ved arv eller gave med den bestemmelse, at indtægterne fore-

fyrst, og at hann, ið ognina eigur, ikki hevur ráð yvir ognini, ímeðan hin fær inntøkurnar,

3) ogn, sum er fingin í arv ella gávu við tilskilan, at inntøkurnar fyri fyrst skulu goymast, og at hann, ið ognina eigur, hvørki skal hava ráð yvir ogn ella inntøkum,

4) nýtslurættindi ella krøv til tíðarviss gjøld, ið eru veitt skattgjaldaranum alla ævi hansara ella styttri óvissa tíð sum rættur, ið ikki má avhendast, sum t.d. rættur til eftirløn, lívrentu o.t., leiguleysan bústað, hald, leypandi gjøld sambært vanlukkutryggingarsáttmála o.t.

løbig skal tilfalde en anden, og at formuen, medens indtægtsnydelsen består, skal være unddraget formueejerens rådighed.

3) formue, som er erhvervet ved arv eller gave med den bestemmelse, at indtægterne foreløbig skal oplægges, og at såvel formue som indtægter skal være unddraget formueejerens rådighed,

4) brugsrettigheder eller krav på periodiske ydelser, der som en personlig uoverdragelig ret er tillagt den skattepligtige for livstid eller kortere ubestemt tid, såsom ret til pension, livrente og lignende, fribolig, aftægtsnydelse, løbende ydelse ifølge ulykkesforsikringskontrakter og lign.

**113. gr.** Við uppgerð av ogn eru skuldir skattgjaldarans frádrignar.

*2. stk.* Til skuld verður ikki talt:

a) ábyrgdir, sum enn ikki eru gjaldkomnar,

b) aðrar skuldbindingar, sum eru treytaðar av nøkrum, ið er óvist.

*3. stk.* Virðið á skuldbindingum skattgjaldarans til at lata tíðarviss gjøld, ið eru persónligur rættur, sum ikki er avhendiligur, og sum eru veitt honum, ið eigur rættin, alla ævi hansara ella styttri óvissa tíð,

**prg. 113.** Ved opgørelsen af formuen fradrages den skattepligtiges gæld.

*stk. 2.* Som gæld betragtes ikke

a) kautionsforpligtelser, med hensyn til hvilke betalingspligten endnu ikke er indtrådt,

b) andre forpligtelser, hvis opståen er afhængig af en kendsgerning, hvis indtræden er uvis.

*stk. 3.* Værdien af den skattepligtiges forpligtelser til at erlægge periodiske ydelser, der som en personlig uoverdragelig ret er tillagt den berettigede for livstid eller kortere tid, såsom pension, livrente, fribolig, af-

sum t.d. eftirløn, lívrenta o.t., leiguleysur bústaður, hald o.t., kann ikki verða drigið frá, tá ognin verður gjørd upp. Somuleiðis kann heldur ikki verða drigið frá virðið á tí nýtslurætti av sama slagi, sum nevndur er frammanfyri, ið hvílir á ognini. Hetta er galdandi uttan mun til, um trygd er latin fyri, at skuldbindingin verður hildin.

tægtsydelser o.l., samt værdien af på den skattepligtiges ejendele hvilende brugsrettigheder af tilsvarende karakter kan ikke fradrages ved opgørelsen af formuen. Dette gælder uanset, om der måtte være stillet sikkerhed for forpligtelsens opfyldelse.

**114. gr.** Ogn, sum persónur hevur inntøkurnar av ella nýtir, meðan annar persónur hevur fingið ognarrættin, tó uttan at hava ráð á henni, so leingi hin fyrr nevndi hevur inntøkurnar ella nýtsluna, verður til helvtar tald uppí ogn hansara, ið inntøkuna ella nýtslu hevur.

*2. stk.* Men hevur hann, ið fær inntøkurnar av ognini ella nýtir hana, sjálvur avkannað sær ognarrættin, tá skal ognin øll verða tald upp í ognaruppgerð hansara.

*3. stk.* Um maður hevur givið burtur ogn og lagt tað band á, at inntøkurnar fyri fyrst verða lagdar til goymslu, og at tann ella teir, ið gávuna fáa, ikki fyri fyrst fáa ráð á ognini við goymdum inntøkum, tá skal hann framvegis telja ognina við teimum burturgoymdu inntøkunum upp í ognaruppgerð sína.

**prg. 114.** Formue, hvoraf en person har indtægts- eller brugsnydelsen, medens ejendomsretten er tillagt en anden, dog uden rådighedsret, så længe indtægts- eller brugsnydelsen varer, medregnes for halvdelens vedkommende i indtægts- eller brugsnyderens formue.

*stk. 2.* Har indtægts- eller brugsnyderen selv fraskrevet sig ejendomsretten til formuen, skal denne dog i sin helhed medregnes i hans formue.

*stk. 3.* Den, som har bortskænket formue med det bånd, at indtægterne foreløbig skal oplægges, og at formuen med oplagte indtægter foreløbig skal være unddraget den eller de begunstigedes rådighed, skal vedvarende medregne formuen med oplagte indtægter.

**115. gr.** Ognin verður gjørd upp undir einum eftir standinum, tá tað inntøkuárið gongur út, sum

**prg. 115.** Formuen opgøres under eet efter forholdene ved udløbet af det indkomstår, som

inntøkuskatturin er álagdur eftir, um ikki øðrvísi er skipað í hesi lóg.

danner grundlag for indtægtsskatteansættelsen, forsåvidt ikke andet måtte være bestemt i det følgende.

**116. gr.** Ogn, sum gift kona eigur, ið býr saman við manni sínum, verður tald upp í ognaruppgerð hansara, tó at ognin er serogn hennara. Somuleiðis telur húsbóndin upp í ognaruppgerð sína og hjá børnum, sum eru yngri enn 16 ár, um so er, at inntøkan av henni skal verða tald upp í skattskyldugu inntøku húsbóndans.

**prg. 116.** Formuen, tilhørende gift kvinde, der samlever med sin ægtefælle, medregnes dennes formueopgørelse, selvom formuen er hendes særeje, ligesom familieoverhovedet medregner i sin formueopgørelse den formue, som tilhører børn under 16 år, forsåvidt indkomsten heraf skal medregnes i familieoverhovedets skattepligtige indkomst.

**117. gr.** Um nú maður og kona skiljast ella verða sundurlisin, tá sendir hvørt hjúnið sær inn ognaruppgerð frá byrjanini á tí skattaárinum, ið kemur aftan á dómsuppsøgnina ella skilnaðarloyvið. Maðurin dregur frá í uppgerð síni tær ognir, sum tilkoma konuni, ella sum vóru hennara serogn, og sum hon nú ræður yvir einsamøll. Konan setur í ognaruppgerð sína tann part av felagsognini, sum maðurin hevur kunnað drigið frá í uppgerð síni.

**prg. 117.** Ved separation og skilsmisse indgiver ægtefællerne hver for sig formueopgørelse fra begyndelsen af det skatteår, som følger efter dommens afsigelse eller bevillingens udfærdigelse. Manden fradrager i sin opgørelse den del af fællesformuen, som er udloddet hustruen, eller som er tilfaldet hende som særeje, og som hun nu disponerer alene over. Hustruen opfører på sin formueopgørelse den del af fællesformuen, som således har kunnet fradrages i mandens opgørelse.

## 12. kapittul

### Skylda at geva upplýsingar um lønir o.a.

**118. gr.** Til eftiransingina við álíkningini skulu á hvørjum ári innan 31. januar, uttan at biðið verður um tað, hesar upplýsingar verða latnar:

a) Øll, hvørs vegna inntøka, sum smb. 60. gr. er at rokna sum A-inntøka, er útgoldin í inntøkuárinum frammanundan, skulu, fyri hvønn løntakara sær, lata upplýsingar um ta samanløgdu inntøkuna, sum gevast skal upp, tá hann skal geva upp til skatt fyri avvarðandi ár, smb. 28. gr. Harafturat skal verða upplýst, í hvørjum tíðarskeiði inntøkan er vunnin, navn móttakarans, persónsnummar, bústaður, bústaðarkommuna og møguliga aðrar upplýsingar, ið eru neyðugar til at sanna, hvør móttakarin er.

b) Upplýsingarskyldugi skal, hvat viðvíkur teimum undir a) nevndu løntakarum, smb. reglum frá líkningarráðnum, upplýsa um møguligar fríar ágóðar, sum hann hevur latið.

c) Upplýsingarskyldan, sum nevnd er undir a), fevnir eisini um útgoldna ella góðskrivaða samsýning til rithøvund ella tónaskald eins og samsýningar til útinnandi listafólk av einum og

## Kapitel 12

### Pligt at meddele oplysninger om lønninger m.v.

**prg. 118.** Til brug med kontrollen med skatteligningen skal der hvert år senest 31. januar uden opfordring gives følgende oplysninger:

a) Enhver, for hvis regning der i det foregående kalenderår er udbetalt indkomst, der efter sin art er A-indkomst i medfør af prg. 60, skal for hver indkomstmodtager give oplysning om den samlede indkomst, der skal medtages ved opgørelsen af den pågældendes skattepligtige indkomst for det pågældende år, jfr. prg. 28. Endvidere skal oplyses den periode, hvori indkomsten er erhvervet, samt modtagerens navn, personnummer, bopæl og bopælskommune tilligemed eventuelle andre oplysninger, der er nødvendige til identifikation af modtageren.

b) For de af litra a) omfattede indkomstmodtagere skal der efter ligningsrådets bestemmelse gives oplysning om eventuelle ydede naturalgoder, der er ydet af den oplysningspligtige.

c) Oplysningspligt, som nævnt under litra a), omfatter tillige udbetalt eller godskrevet indkomst i form af forfatter- eller komponisthonorarer samt honorarer til udøvende kunstnere

hvørjum slag, í tann mun samsýningin er undir reglunum í a). Somuleiðis útgjalding av avgjaldi fyri nýtslu av einkarrætti, fyrimynd, vørumerki o.l., uttan mun til um avgjaldið verður goldið leypandi ella í einum.

*2. stk.* Upplýsingarskyldugi skal siga frá samanlagdu inntøkuni, sum er nevnd í 1. stk. a) ávikavist 1. stk. c). Upplýsingarskyldugur, sum hevur skyldu at lata inn roknskap saman við sjálvuppgávuni, skal í roknskapinum skila til, hvar tær lønir, samsýningar v.m., sum eru undir upplýsingarskylduni í 1. stk. a) og c), eru bókaðar, soleiðis at víst verður sammeting millum ársroknskapin og tær í 1. punktum nevndu samanlagdu inntøkuupphæddum. Partafeløg, ið ikki hava álmanakkaárið sum roknskaparár, skulu lata inn yvirlit yvir, hvussu tær í roknskapinum bókaðu lønir v.m. eru býttar út á teir partar av álmanakkaárinum, sum eru roknskaparskeiðið.

*3. stk.* Um hann, ið vørs vegna avvarðandi inntøka verður útgoldin, ikki hevur heimating í Føroyum, og fulltrúi, sum hevur heimating í Føroyum, stendur fyri útgjaldingunum, hvílir upplýsingarskyldan smb. 1. og 2.

af enhver art, i det omfang indkomsten er omfattet af litra a). Endvidere udbetaling af afgift for udnyttelse af patentrettigheder, mønster, varemærke o.lign., hvad enten afgiften erlægges som en løbende ydelse eller som en sum en gang for alle.

*Stk. 2.* Den oplysningspligtige skal oplyse størrelsen af den samlede indkomst, der er oplyst efter stk. 1, a) henholdsvis stk. 1, c). Oplysningspligtige, der har pligt til at vedlægge selvangivelsen et årsregnskab, skal heri oplyse, i hvilke regnskabsposter og med hvilke beløb lønninger, honorarer m.v., der er omfattet af oplysningspligten efter stk. 1, a) og c), er placeret, således at der vises en afstemning mellem årsregnskabet og de efter 1. punktum meddelte samlede indkomstbeløb. Aktieselskaber m.v., der benytter et fra kalenderåret afvigende regnskabsår, skal indsende en specifikation, der oplyser, hvorledes de i regnskabet anførte lønninger m.v. fordeler sig på de dele af kalenderår, der udgør regnskabsperioden.

*Stk. 3.* Når den, for hvis regning den pågældende indkomst udbetales, ikke har hjemting på Færøerne, og udbetalingen foretages af en dertil befuldmægtiget, der har hjemting på Færøerne, påhviler oplysningsplig-

stk. á fulltrúanum.

*4. stk.* Reglurnar í 63. gr., 2. stk. verða nýttar á samsvarandi hátt, tá løntakarin skal lata upplýsingarskylduga upplýsingar, ið skulu sanna, hvør hann er.

*5. stk.* Heldur upplýsingarskyldugi uppat við virki sínum, kann skattavaldið krevja, at tær í 1. og 2. stk. nevndu upplýsingar verða innlatnar, áðrenn 10 dagar eru farnir, frá tí at tær verða umbidnar. Heldur skattskylda løntakarans uppat í Føroyum, kann verða kravt, at tær í 1. stk. nevndu upplýsingar verða innlatnar við somu freist.

*6. stk.* Løntakarin skal hava avrit av teimum upplýsingum, sum smb. hesi gr. eru latnar um hann.

*7. stk.* Tær upplýsingar, sum nevndar eru í 1. og 2. stk., skulu eftir leiðbeining frá líkningarráðnum latast á serstøkum oyðibløðum. Líkningarráðið kann í hesum sambandi krevja, at upplýsingar eisini skulu latast um serstakar veitingar, sum eru útgoldnar sum partur av inntøkuni smb. 1. stk., ella sum endurgjald fyri goldnar útreiðslur, sum t.d. endurgjald fyri ferðir, flutning ella umboðan.

*8. stk.* Líkningarráðið kann fyri bólkar av upplýsingarskyldugum ella fyri ávís sløg av inntøkum lætta um krøvini til upplýsingarnar. Tey í 2. stk. nevndu



ten efter stk. 1 og 2 den befuldmægtigede.

*Stk. 4.* Bestemmelsen i prg. 63, stk. 2, finder tilsvarende anvendelse med hensyn til indkomstmodtagerens afgivelse af identifikationsoplysninger til den oplysningspligtige.

*Stk. 5.* Ophører den oplysningspligtige med at drive virksomhed, kan skattemyndighederne kræve de i stk. 1 og 2 omhandlede oplysninger indsendt med en frist på 10 dage. Ophører en indkomstmodtager med at være skattepligtig på Færøerne, kan de i stk. 1 omhandlede oplysninger kræves indsendt med samme frist.

*Stk. 6.* Indkomstmodtageren skal have kopi af de i henhold til denne paragraf afgivne oplysninger vedrørende ham.

*Stk. 7.* De i stk. 1 og stk. 2, 1. pkt. nævnte oplysninger skal anføres på særlige blanketter efter ligningsrådets anvisninger. Ligningsrådet kan i forbindelse hermed bestemme, at der skal gives oplysninger om særlige ydelser, der er udbetalt som en del af indkomsten efter stk. 1, eller som godtgørelse for afholdte udgifter, f.eks. godtgørelse for rejser, befordring eller repræsentation.

*Stk. 8.* Ligningsrådet kan lempe oplysningskravene for grupper af oplysningspligtige eller for visse arter af indkomst. De i stk. 2 anførte krav kan da

krøv kunnu tó varðveitast, tá tað snýr seg um inntøkur, ið annars høvdu komið undir 1. stk.

opretholdes vedrørende indkomst, der ellers ville være omfattet af stk. 1.

**119. gr.** Øll, sum reka vinnu, hava, annaðhvørt tey sambært lógina eru skyldug at føra roknskap ella ikki, skyldu til at leggja fyri líkningarvaldini roknskapartilfar sítt við fylgiskjølum, bæði fyri eldri og inniverandi ár, tá hetta verður kravt, og annars øll skjøl, sum kunnu verða til sannan av álíkningini. Sama skylda liggur á feløgum v.m., felagsskapum, stovnum, gávufægrunnum og sjálvsognarstovnum, antin teir reka vinnu ella ikki. Er roknskapartilfarið v.m. hjá triðjamanni, skal hann, sjálvt um hann hevur rætt til at afturhalda tað, lata líkningarvaldinum tað, sum aftan á nýtslu skulu lata triðjamanni tað aftur.

**prg. 119.** Enhver erhvervsdrivende, er, hvad enten han iflg. lovgivningen er regnskabspligtig eller ej, pligtig til på forlangende at forelægge de skattelignende myndigheder sit regnskabsmateriale med bilag, for såvel indeværende som tidligere år, og andre dokumenter der kan have betydning for skatteligningen.

Samme pligt påhviler også selskaber m.v., foreninger, stiftelser, legater og andre selvejende institutioner, hvad enten de driver erhverv eller ej. Beror regnskabsmaterialet m.v. hos tredjemand, skal denne, selvom han har tilbageholdelsesret herover, udlevere materialet til de skattelignende myndigheder, som i så fald skal drage omsorg for, at materialet tilbagesendes til den pågældende tredjemand.

*2. stk.* Øll, sum reka vinnu, hava, annaðhvørt tey sambært lógini hava roknskaparskyldu ella ikki, skyldu til at lata líkningarráðið ella persón, sum líkningarráðið tilnevnir, sleppa á staðið at eftirkanna roknskapartilfarið og øll skjøl, sum kunnu vera av týdningi fyri rættleikan av álíkningini. Eisini kann líkningarráðið á staðnum gera kassauppgerð v.m.

*stk. 2.* Enhver erhvervsdrivende er, hvad enten han iflg. lovgivningen er regnskabspligtig eller ej, pligtig at give ligningsrådet eller den person, som dette vælger i sit sted, adgang til på stedet at gennemgå regnskabsmaterialet og alle dokumenter, der kan have betydning for skatteligningens rigtighed. Ligningsrådet kan i forbindelse hermed foretage opgørelse af kassebeholdning m.v.

*3. stk.* Eisini hevur líkningarráðið ella tann persónur, ið líkningarráðið tilnevnir, rætt til at koma á staðið at gera upp og meta um vørugoymsluna, innistøðu, innbúgv, maskinur og onnur amboð. Landsstýrið kann gera av, at løgreglan hjálpir í slíkum førum.

*stk. 3.* Ligningsrådet eller den person, som dette vælger i sit sted, er også berettiget til at få adgang til på stedet at foretage opgørelse og vurdering af lagerbeholdninger, besætning, inventar, maskiner og andet driftsmateriel. Med hensyn til gennemførelse af disse, kan politiet yde bistand efter landsstyrets afgørelse.

**120. gr.** Øll almenn vald og stjórnir fyri peningastovnar, feløg, tryggingarvirki, felagsskapir, stovnar, gávufægrunnar og aðrar stovnanir eru skyldug eftir áheitan ókeypis at lata líkningarráðnum ella tí persóni, sum líkningarráðið hevur tilnevnt, allar tær upplýsingar, ið kunnu vera til leiðbeiningar í starvi tess — tó einans eftir avgerð landsstýrisins, tá tað er um fleiri ónevndar skattgjaldarar at røða. Somu skyldu hava sakførarar og grannskoðarar í viðurskiftum sínum við viðskiftafólk.

**prg. 120.** Offentlige myndigheder og bestyrelser for pengeinstitutter, selskaber, forsikringsvirksomheder, foreninger, stiftelser, legater og andre institutioner er på begæring uden betaling pligtige til skriftligt at meddele ligningsrådet eller den person, som dette vælger i sit sted, alle de oplysninger, der kan tjene denne myndighed til vejledning ved udførelsen af dens hverv. Forsåvidt angår oplysninger vedrørende ikke navngivne skatteydere dog kun efter landsstyrets nærmere bestemmelser. Samme pligt påhviler advokater og revisorer, forsåvidt angår mellemværende med deres klienter.

*2. stk.* Bankar, vekslarar og aðrar peningastovnanir og persónar, ið hava slíkan handil við virðisskjølum, at teir eru skyldugir at halda bøkur eftir lóg, skulu, tá teir verða kravdir, geva líkningarráðnum tær upplýsingar um keyp og sølu av virðisskjølum, sum kunnu verða til

*stk. 2.* Banker, vekselere og andre pengeinstitutter og personer, som driver sådan omsætning med værdipapirer, at de er pligtige at føre bøger i henhold til lov, skal på forlangende meddele ligningsrådet de oplysninger vedrørende køb og salg af værdipapirer, der kan tjene til

leiðbeiningar, tá skattur verður álagdur. Har ið keypari ella seljari er umboðaður av sakførara ella øðrum fulltrúa, hevur hann skyldu at siga frá navni, føðingardegi ella persónsnummari og bústaði hjá klienti sínum.

*3. stk.* Verksmiðjueigarar, heilsølumenn, iðnaðarvirki, fiskavirki og onnur vinnurekandi, tá landsstýrið ger av, at tey hava so miklan handil ella handla við ella framleiða slíka vøru, at tey eiga at verða sett javnt við teir, ið frammanfyri eru nevndir, skulu, tá tey verða kravd, geva líkningarvaldinum upplýsingar um viðskifti síni við einstakar nevndar, viðskiftamenn ella útvegamenn, tó einans viðvíkjandi handli við slíkum vørum, sum keyparin ella útvegamaðurin, ið spurt er um, selur ella framleiðir í vinnu ella virki sínum.

vejledning ved skatteansættelsen. Hvor køberen eller sælgeren repræsenteres af en advokat eller anden befuldmægtiget, er denne pligtig at give oplysning om klientens navn, fødselsdato eller personnummer og adresse.

*stk. 3.* Fabrikanter, engros handlende, industri- og fiskerifabrikker samt andre næringsdrivende, som efter landsstyrets afgørelse under hensyn til størrelsen af deres omsætning eller arten af de varer, som de forhandler eller fremstiller, skønnes at burde sidestilles med disse, skal på begæring meddele ligningsmyndigheden oplysning om deres omsætning med enkelte navngivne kunder eller leverandører, dog kun forsåvidt det drejer sig om omsætning af sådanne varer, som af vedkommende kunde eller leverandør forhandles eller fremstilles som et led i hans næring eller bedrift.

**121. gr.** Somu reglur, sum nevndar eru í 120. gr., 3. stk., galda eisini fyri nevndir fyri feløgum v.m., kommandittfeløgum, partsreiðaríum, felagsskapum av einum og hvørjum slag, stovnum, gávufægrunnum og øðrum stovnanum og grunnum, hetta uttan mun til um tey eru skattskyldug ella ikki.

**prg. 121.** Samme regler, som er omtalt i prg. 120, stk. 3, gælder også for bestyrelser i selskaber m.v. kommanditselskaber, partrederier, foreninger af enhver slags, stiftelser, legater og andre institutioner, uanset om disse er skattepligtige eller ej.

**122. gr.** Tey í 1. gr. nr. 12 og 13 nevndu feløg hava umframt tær í 120. gr. 3. stk. nevndu skyldur

**prg. 122.** De i prg. 1, nr. 12 og 13 omtalte selskaber har foruden de i prg. 120, stk. 3 nævnte

eisini skyldu til at upplýsa fyri líkningarmyndugleikunum um viðskifti sini við einstakar nevndar limir. Henda skylda fevnir um øll viðskifti teirra við ávísar limir, tá hon kann verða líkningarmyndugleikunum til leiðbeiningar í starvi teirra, tó einans eftir avgerð landsstýrisins, tá um fleiri ónevndar limir er at røða.

forpligtelser også pligt til at oplyse lignignsmyndigheden om deres mellemværende med navngivne medlemmer. Denne pligt påhviler dem om alt mellemværendet med bestemte medlemmer, hvis det kan tjene lignignsmyndigheden til vejledning ved udførelsen af dens hverv, dog, forsåvidt angår en flerhed af ikke navngivne medlemmer, kun efter landsstyrets nærmere bestemmelse.

**123. gr.** Uttan mun til ásetingarnar í lóg um Postverk Føroya, um tagnarskyldu v.m., so eru somu reglur galdandi fyri Postgirostovuna um upplýsingarskyldu v.m. fyri líkningarráðnum, sum er álagt øðrum peningastovnum í hesi lóg.

**prg. 123.** Uanset bestemmelserne i lov om »Postverk Føroya« om postvæsenets tavshedspligt m.m., så gælder samme regler for det færøske postgirokontor om oplysningspligt m.m. over for ligningsrådet, som påhviler andre pengeinstitutter.

**124. gr.** Føroya Gjaldstova og herundir tollvaldið hava skyldu til at veita skattavaldinum upplýsingar um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri skattaálíkningina og skattainnkrevjingina. Landsstýrið kann gera nærri reglur í hesum sambandi.

**prg. 124.** »Føroya Gjaldstova«, herunder toldvæsenet, har pligt til at give skattemyndighederne oplysninger om forhold af betydning for ligningen og skatteopkrævningen. Landsstyret udformer de nærmere regler i denne forbindelse.

**125. gr.** Fyri hvørja kommunu í landinum verður førd ein skrá yvir allar ávísingarskyldugar eftir reglum, sum landsstýrið ger í samráð við líkningarráðið.

*2. stk.* Í hesum reglum kann verða álagt teimum ávísingar-

**prg. 125.** For hver kommune i landet føres et register over alle anvisningspligtige efter de regler, landsstyret gør i samråd med ligningsrådet.

*stk. 2.* I disse regler kan det pålægges de anvisningspligtige

skyldugu at geva líkningarráðnum uppýsingar um:

1) nær ávísingarskyldan er byrjað, og nær hon er endað.

2) broyting av bústaði hjá einum ávísingarskyldugum.

*3. stk.* Líkningarráðið hevur eftirlit við, at teir ávísingarskyldugu halda tær skyldur, sum henda lóg áleggur teimum. Líkningarráðið kann koma á staðið hjá einum ávísingarskyldugum, uttan mun til um hann førir roknskap ella ikki, og har kanna alt roknskapartilfarið og øll tey skjøl, sum kunnu hava týdning fyri hetta eftirlit. Eisini hava allir ávísingarskyldugir, sum gera roknskap, uttan mun til um teir hava bókhaldsskyldu sambært lóg ella ikki, skyldu til eftir áheitan at senda alt roknskapartilfarið við øllum skjølum til líkningarráðið.

*4. stk.* Ber nakar seg undan at gera eftir krøvunum í 2. og 3. stk., kann verða áløgd daglig sekt, sum landsstýrið ásetur.

*5. stk.* Landsstýrið ger nærri reglur fyri, hvussu ásetingarnar í 3. stk. skulu nýtast. Landsstýrinum er heimilt at krevja, at løgreglan hjálpir skattavaldinum í sambandi við ásetingarnar í 3. stk.

*6. stk.* Skattavaldið kann eisini í sambandi við nevnda eftirlit krevja upplýsingar frá mót-

at give ligningsrådet meddelelse om:

1) indtræden og ophør af anvisningspligt,

2) ændring af den anvisningspligtiges adresse.

*stk. 3.* Ligningsrådet fører kontrol med, at de anvisningspligtige overholder de pligter, der påhviler dem efter denne lov. Ligningsrådet kan hos de anvisningspligtige, uanset om disse fører egentligt regnskab eller ej, foretage eftersyn af alt regnskabsmateriale og herunder kræve fremlagt dokumenter af betydning for kontrollen. Enhver anvisningspligtig, der fører regnskab, skal, hvad enten han i henhold til lov er bogføringspligtig eller ej, efter anmodning fra ligningsrådet til denne indsende sit regnskabsmateriale med bilag.

*stk. 4.* Vægrer nogen sig ved at efterkomme en i henhold til bestemmelserne i stk. 2 og 3 fremsat begæring, kan der pålægges en daglig bøde, som afgøres af landsstyret.

*stk. 5.* Landsstyret kan fastsætte regler vedrørende anvendelsen af bestemmelserne i stk. 3. Landsstyret kan kræve, at politiet yder skattemyndighederne bistand i forbindelse med reglerne i stk. 3.

*stk. 6.* Skattemyndigheden kan hos modtageren af A-indkomst indhente oplysninger

takarum av A-inntøku.

**126. gr.** Ber nakar seg undan at gera eftir kravi, ið er komið frá líkningarvaldunum sambært reglunum í hesum kapitli, ger landsstýrið av, um hann er skyldugur til tess, og tað hevur heimild til, um tað gerst neyðugt, at tvinga hann til at útinna hesa skyldu við at leggja á dagliga sekt.

**127. gr.** Í alment skiftum búgvum, sum skiftirættirin tekur til viðgerðar, skal skiftistjóri, áðrenn 2 mánaðir eru lidnir frá andláti, ókravdur upplýsa líkningarráðnum um ognina, ið hin deyði læt eftir seg, tá hon er ikki minni enn 25.000 kr., og skal hann, tá kravt verður, geva tílíkar upplýsingar afturat, sum kunnu fáast til vegar til at fáa greiði á spurninginum, um sjálvuppgávurnar hjá hinum deyða hava verið rangar. Gerst tað neyðugt, hevur landsstýrið heimild til at leggja á dagsekt til at tvinga hann at útinna hesa skyldu.

*2. stk.* Áðrenn 2 mánaðir eru lidnir frá tí, at tær seinast kravdu upplýsingar eru fingnar, skal verða sagt búnum frá, at krav verður gjørt í búnum sambært 137. gr. Fyrr enn áðurnevndu freistir eru úti, má búsviðgerðin ikki verða lokin, uttan so at líkningarráðið hevur vátt-

til brug ved kontrollen med indeholdelserne.

**prg. 126.** Vægrer nogen sig ved at efterkomme en i henhold til bestemmelserne i dette kapitel fremsat begæring fra de skattelignende myndigheder, afgør landsstyret, hvorvidt han er pligtig dertil, og kan om fornødent fremtvinge pligtens efterkommelse ved pålæg af en daglig bøde.

**prg. 127.** I offentligt skiftede boer skal skifteforvalteren inden 2 måneder efter dødsfaldet uopfordret meddele ligningsrådet oplysning om afdødes efterladte formue, forsåvidt de udgør mindst 25.000 kr., samt derefter på forlangende give sådanne yderligere oplysninger, som kan fremskaffes til brug ved afgørelsen af spørgsmålet om, hvorvidt det kan antages, at afdødes selvangivelser har været urigtige. Denne forpligtelse kan om fornødent fremtvinges ved en af landsstyret pålagt daglig bøde.

*stk. 2.* Der skal inden 2 måneder efter modtagelsen af de sidstbegærede oplysninger ske anmeldelse til boet om, at der vil blive gjort krav gældende mod boet i henhold til prg. 137. Forinden udløbet af de førnævnte frister må boets behandling ikke afsluttes, medmindre der fra lig-

að, at tílíkt krav ikki verður gjørt. Verður ikki sagt búnum frá í rættari tíð, fellur samábyrgd arvinganna sambært 43. gr., 2. stk., burtur.

*3. stk.* Eisini skal skiftirættur greiða líkningarráðnum frá innihaldinum, bæði í teimum tilsøgnum um búskifti, sum arvingar senda inn, ið skifta sjálvir, og í teimum búsuppgerðum, sum eftirlivandi hjúnafelagi, ið verður sitandi í óskiftum búgvi, skal senda inn sambært regluni í kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921, 31. gr., um so er, at skuldleysar ognir í búnum eru ikki minni enn 25.000 kr. Frágreiðingin, sum hann skal senda líkningarráðnum innan 2 mánaðir eftir tað, at arvatilsøgnin ella búsuppgerðin er komin skiftirætti í hendur, skal, annaðhvørt sum avskrift av tilsøgnini og uppgerðini ella sum úrdráttur úr teimum, geva upplýsingar um navnið á hinum deyða, starv hansara og bústað, og harumframt greiða frá arvaviðurskiftunum og geva greiniligt yvirlit yvir ognir og skuldir í búnum.

**128. gr.** Har líkningarvaldini sambært hesi lóg hava fingið rætt til at krevja upplýsingar, sum tey skulu nýta, tá skattur verður lagdur á, eigur landsskattanevndin sama rætt, tá hon viðger kærur.

ningsrådet foreligger erklæring om, at sådant krav ikke vil blive fremsat. Skulle rettidig anmeldelse ikke ske, bortfalder arvingernes solidariske ansvar i henhold til prg. 143, stk. 2.

*stk. 3.* Endvidere skal skifteretten meddele ligningsrådet underretning om indhold såvel af de arveanmeldelser, som indgives af selvskiftende arvinger, som af de boopgørelser, der i henhold til reglen i kgl. anordning nr. 468 af 8. november 1921, prg. 31, indsendes af længstlevende ægtefælle, der forbliver hensiddende i uskiftet bo, alt forsåvidt bobeholdningen overstiger 25.000 kr. Underretningen, der vil være at tilstille ligningsrådet inden 2 måneder efter anmeldelsens eller opgørelsens modtagelse, kan meddeles enten ved en afskrift af selve arveanmeldelsen og opgørelsen eller ved et uddrag af samme, der foruden oplysning om afdødes navn, stilling og bopæl samt beholdningens størrelse tillige skal indeholde angivelse af arveforholdene samt specification af boets aktiver og passiver i hovedposter.

**prg. 128.** Hvor der i nærværende lov er tillagt de skattelignende myndigheder ret til at kræve oplysninger til brug ved skatteligningen, tilkommer samme ret landsskatteudvalget til brug ved behandlingen af klager.

## 13. kapittul

### Skuldbindingar- og innheintingarreglur

**129. gr.** Hann, sum letur vera við at avrokna A-inntøkur gjøgnum tey av landsstýrinum góðkendu avrokningarstøð, hevur sjálvur fyri skattavaldinum beinleiðis ábyrgd av, at tann skattaupphædd, sum vantar í, verður goldin, uttan so hann kann prógva, at hann ikki við vansketni hevur latið vera við at gingið undir reglurnar í hesi lóg.

*2. stk.* Hann, sum hevur avroknað A-inntøku gjøgnum tey av landsstýrinum góðkendu avrokningarstøð, hevur loyst seg frá fleiri krøvum frá skattavaldinum um at gjalda meira skatt av tí avroknaðu A-inntøkuni.

*3. stk.* Um kravið móti ávísingarskylduga ikki kann verða uppgjørt vegna hansara serligu viðurskifti, kann skattavaldið fyribils meta um kravið.

## Kapitel 13.

### Hæftelses- og inddrivelsesbestemmelser

**prg. 129.** Den, som undlader at opfylde sin pligt til at afregne A-indkomst gennem de af landsstyret godkendte afregningssteder, er over for det offentlige umiddelbart ansvarlig for betaling af manglende skattebeløb, medmindre han godtgør, at der ikke er udvist forsømmelighed fra hans side ved iagttagelse af bestemmelserne i denne lov.

*Stk. 2.* Den, som har afregnet A-indkomst gennem de af landsstyret godkendte afregningssteder, er frigjort for yderligere krav fra skattemyndighedernes side vedrørende skatter af den afregnede A-indkomst.

*Stk. 3.* Hvis kravet mod den anvisningspligtige på grund af dennes forhold ikke kan opgøres nøjagtigt, kan skattemyndigheden foretage en foreløbig skønsmæssig ansættelse af kravet.

**130. gr.** Um eingin A-skattur er eftirhildin í A-inntøku, ella ov lítið er eftirhildið, skal móttakarin av hesi inntøku beinanveg gjalda ta frestandi upphæddina til skattavaldið.

**prg. 130.** Er der i A-indkomst ikke sket indeholdelse af skat, eller er indeholdelsen sket med for lavt beløb, skal erhververen straks indbetale det manglende beløb til det offentlige.

**131. gr.** Tann, sum í Føroyum hevur fulltrú fyri teir í 2. gr. skattskyldugu, tekur ábyrgdina

**prg. 131.** De på Færøerne værende befuldmægtigede for de efter prg. 2 nævnte skatteplig-

av, at teir skattir, sum verða álagdir hesum skattskyldugu, verða goldnir.

**132. gr.** Er ikki gjørligt at innheinta skattin frá skattgjaldara, er loyvt at panta hjá hjúnafelaga hansara, um skatturin hevur sín uppruna frá skattaskeiði, tá hjúnini vórðu skattað saman.

**133. gr.** Teir skattir, sum verða álíknaðir einum persóni, aftan á at hann er deyður, hevur búgvið ella arvingarnir ábyrgd av verður goldin. Arvingarnir hava samábyrgd, men bert í mun til ta upphædd, teir móttaka ella hava fingið frammanundan av arvi ella arvaforskoti, hjúnafelagin tó eisini við sínum búluti. Skuldbindingin verður ikki ávirkað av, at ognararnir hjá hinum deyða verða innkallaðir.

**134. gr.** Um eitt felag ella ein felagsskapur v.m. verður avtikið og ognin skift sundur millum partaeigarar ella limir, uttan at nakar peningur verður lagdur burturfrá til at gjalda tann skatt, sum hvílir á felagsskapinum, skulu partaeigarar ella limir saman við avtøkustjóra ella -- har slíkur ikki er valdur ella tilnevndur -- nevndin vera skyldugir at gjalda skattin og bera samábyrgd av hesum. Av avtøkustjóra/nevndini kann sam-

tige er medansvarlige for betaling af de skatter, der påhviler disse skattepligtige.

**prg. 132.** Er opkrævning af skattebeløbet forgæves forsøgt hos skatteyderen, kan udpantning foretages hos dennes ægtefælle, hvis skattebeløbet stammer fra en tidsperiode, hvor ægtefællerne har været sambeskattede.

**prg. 133.** For skatter, der pålignes en person efter dødsfaldet, hæfter boet eller arvingerne. Arvingerne hæfter solidarisk, men kun med det beløb, som de modtager eller har modtaget som arv eller arveforskud, ægtefællen dog tillige med boslodden. Forpligtelsen påvirkes ikke af, at der er sket indkaldelse af afdødes kreditorer.

**prg. 134.** [illegible]

ábyrgd ikki verða kravd fyri meira enn ta samanløgdu upphæddina, sum er skift sundur millum parteigarar ella limir, og og parteigarar og limir skuldbindast bert í mun til tað, sum er skift sundur millum teirra.

**135. gr.** Hevur skattgjaldari ikki goldið skattin, áðrenn gjaldsfreistin er úti, skal hann gjalda rentu av tí skatti, hann skyldar, 1% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegi. Renta av skatti, sum hin skattskyldugi skyldar, verður gjørd upp eina ferð um árið og kravd saman við frestandi skatti fyri tey ávísu árini.

*2. stk.* Er skattur, sum ávísingarskyldugur, smb. 129. gr. eftir hesi lóg skal gjalda inn til tað almenna, ikki goldin rættstundis, skal tann ávisingarskyldugi gjalda rentu, sum fellur til landskassan, við 1,5% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum.

*3. stk.* Er upphædd, sum eftir hesi lóg skal gjaldast tí almenna, ikki goldin rættstundis, kann upphæddin við afturatkomnum eykagjøldum, rentum o.t. krevjast inn við panting eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum og avgjøldum.

*4. stk.* Er ikki gjørligt at heinta skattin hjá skattskyldugu sjálvum ella hjúnafelaga hans

svar ikke gøres gældende for et større beløb end summen af de til aktionærer eller medlemmer foretagne udlodninger, og aktionærer eller medlemmer hæfter kun i det omfang, hvori de har modtaget udlodning.

**prg. 135.** Er et beløb, som en skattepligtig efter denne lov skal indbetale til det offentlige, ikke betalt rettidigt, skal den pågældende betale en landskassen tilfaldende rente, der udgør 1% pr. påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne. Renter af skat, der påhviler den skattepligtige, opgøres en gang om året og opkræves sammen med restskatten for de pågældende år.

*Stk. 2.* Er et skattebeløb, som en anvisningspligtig, jfr. prg. 129 efter denne lov, skal indbetale til det offentlige, ikke betalt rettidigt, skal den anvisningspligtige betale en landskassen tilfaldende rente, der udgør 1,5% pr. påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

*Stk. 3.* Er et beløb, som nogen efter denne lov skal indbetale til det offentlige, ikke indbetalt rettidigt, kan det manglende beløb tillige med tillæg, renter og gebyret inddrives ved udpantning efter reglerne om inddrivelse af skatter og afgifter.

*Stk. 4.* Er udpantning [illegible]

ara, kann innheinting, um tað gerst neyðugt, verða gjørd í ogn, sum børnini eiga, um vinningur av ognini sambært 5. gr. 4. stk. verður skattaður hjá foreldrunum. Hetta er ikki galdandi við innheinting av skatti, sum ein ávísingarskyldugur skuldi havt avroknað.

kan inddrivelse ske i ejendele, der tilhører børn, såfremt formueafkastet beskattes hos forældrene i henhold til prg. 5, stk. 4. Dette gælder ikke ved inddrivelse hos en anvisningspligtig for skattebeløb, som denne skulle afregne.

**136. gr.** Er upphædd, sum skal gjaldast eftir hesi lóg, ikki goldin, tá gjaldsfreistin var úti, kann innkrevjingarvaldið síggja til, at upphæddin við afturatkomnum eykagjøldum, rentum o.t. verður eftirhildin í A-inntøku skattgjaldarans. Tá eftirhalding verður sett í verk, skal skattgjaldarin fáa fráboðan um hetta.

*2. stk.* Eftirhald eftir 1. stk. kann saman við eftirhalding av A-skatti annars í mesta lagi verða 65% av A-inntøkuni.

*3. stk.* Eftirhald eftir 1. og 2. stk. kann verða gjørt hjá hjúnafelaga skattgjaldarans, í tann mun hesin ábyrgdast fyri gjalding av skattinum.

*4. stk.* Reglurnar í 1.-3. stk. verða eisini nýttar, tá tað snýr seg um innkrevjing av skattum og avgjøldum, sum stava frá tíðini, áðrenn henda lóg kom í gildi.

*5. stk.* Reglurnar í 63. gr. 6. stk. verða nýttar á sama hátt við eftirhalding eftir 1.-4. stk.

**prg. 136.** Såfremt et beløb, der skal betales efter denne lov, ikke er betalt ved betalingsfristens udløb, kan opkrævningsmyndigheden foranledige, at ydelserne med tillæg, renter og gebyrer inddrives ved indeholdelse i skatteyderens A-indkomst. Når indeholdelse iværksættes, skal skatteyderen underrettes derom.

*Stk. 2.* Indeholdelse efter stk. 1. kan sammen med indeholdelsen af A-skat højst andrage 65% af A-indkomsten.

*Stk. 3.* Indeholdelse efter stk. 1 og 2 kan ske hos skatteyderens ægtefælle i det omfang, denne hæfter for skattens betaling.

*Stk. 4.* Reglerne i stk. 1-3 finder tillige anvendelse ved inddrivelse af skatter og afgifter m.v., der er påløbet, før denne lov trådte i kraft.

*stk. 5.* Reglerne i prg. 63, stk. 6, finder tilsvarende anvendelse ved indeholdelse i h.t. stk. 1-4.

*6. stk.* Reglurnar í 125., 129. og 146. gr. verða nýttar á sama hátt, tá hildið verður eftir smb. fyriskipanini í hesi grein.

*Stk. 6.* Bestemmelserne i prg. 125, 129 og 146 finder tilsvarende anvendelse med hensyn til de i denne prg. omhandlede forhold.

**137. gr.** Deyðsbúgv og trotabúgv svara fyri skattaeftirstøðum ávikavist hjá hinum deyða og hjá trotamanninum. Henda skuldbinding verður ikki skerd av innkallan við proklama.

**prg. 137.** Dødsboer og konkursboer tilsvarer henholdsvis den afdødes og fallentens skatterestancer. Denne forpligtelse påvirkes ikke af et i boet udstedt proklama.

**138. gr.** Eingin skattgjaldari kann koma sær undan skyldu síni at rinda tann skatt, ið longu er fallin til gjaldingar, hvørki við at kæra um skattsetingina ella, um hann verður pantaður fyri skattin, við at mótmæla hjá pantifútanum, uttan so at vald, ið hevur heimild til tess, fyrst hevur gjørt av, at broyting eigur at verða, ella at skattsetingin er gjørd av órættum ella er ógild.

**prg. 138.** Ingen skattepligtig kan ved at klage over skatteansættelsen, eller, såfremt der sker udpantning for skatten, ved indsigelse for fogeden unddrage sig forpligtelsen til at indbetale den forfaldne del af skatten, medmindre der forinden foreligger en af kompetent myndighed truffen afgørelse om, enten at en ændring bør finde sted, eller at ansættelsen er sket med urette eller er ugyldig.

## 14. kapittul

### Um revsing fyri at geva rangt upp o.a. og um eftirgjalding av ov lítið goldnum skatti og revsireglur annars.

**139. gr.** Greiðir persónur av svikalistum rangt frá, leggur burturúr ella gevur á annan hátt villleiðandi upplýsingar at fara eftir, tá skattskyldug innøka hjá honum sjálvum ella hjá skattgjaldara, ið hann umboðar, skal verða mett til skatt, ella at nýta, tá skattur hansara sjálvs ella skattgjaldara, ið hann umboðar, sambært hesi lóg skal verða útroknaður, verður hann, annaðhvørt hitt almenna nevur mist nakað av tí ella ikki, revsaður við sekt upp til 5 ferðir ta peningshædd, ið av svikum hansara er ella, um farið var eftir upplýsingunum, hevði verið tikið frá tí almenna. Men er hetta, ið frammanfyri er nevnt, einans gjørt av stórum gáloysi, er sektin upp í 3 ferðir áður nevndu peningshædd.

*2. stk.* Landsstýrið dømir sektina, uttan so at tað ella hin sekti vil, at málið verður avgjørt við rættargangi.

*3. stk.* Dømdur sektarpeningur sambært tí, ið frammanfyri er ásett, verður býttur millum teir kassar, ið hava rætt til skatt in eftir tí, sum hvør eigur av skattinum.

*4. stk.* Sekt sambært tí, ið

## Kapitel 14.

### Om straf for urigtig selvangivelse m.m. og om efterbetaling af for lidt erlagt skat samt straffebestemmelser i øvrigt

**prg. 139.** Den, der i svigagtig hensigt afgiver urigtige, ufuldstændige eller på anden måde vildledende oplysninger til brug ved ansættelsen af sin egen eller en af ham repræsenteret skatteyders skattepligtige indkomst eller til brug ved beregningen af sin egen eller en af ham repræsenteret skatteyders skat i henhold til nærværende lov straffes, hvad enten det offentlige har lidt tab derved eller ej, med bøde af indtil 5 gange det beløb, der ved svigagtige forholdet eller, såfremt oplysningerne var blevet taget til følge, ville være unddraget det offentlige. Foreligger der ved et forhold, som det foran omtalte, grov uagtsomhed, er straffen indtil 3 gange det nævnte beløb.

*Stk. 2.* Bøden ikendes af landsstyret, medmindre dette eller den skyldige selv ønsker sagen afgjort ved retsforfølgning.

*Stk. 3.* Bøde, der ikendes i henhold til foranstående bestemmelse, [illegible]

framman fyri er sagt, ber til at krevja úr deyðsbúgvi hansara, sum dømdur var í sekt. Hevur tann, ið sektaður er, virkað fyri felag v.m., og hann ikki rindar sektina, ber til at krevja felagið v.m. eftir hetti og kann heinta hana inn við panting eftir reglunum í 135. gr. 3. stk.

anstående kan kræves betalt i bødefældtes dødsbo. Har bødefældte handlet for et selskab eller en forening m.v., kan bøden, hvis den ikke betales af bødefældte, forlanges betalt af og kan inddrives ved udpantning hos selskabet eller foreningen m.v., efter reglerne i prg. 135, stk. 3.

**140. gr.** Tann, sum í starvi sínum hjálpir skattgjaldara at skriva sjálvuppgávu hansara til líkningarvaldið og undandregur ella roynir at undandraga tí almenna skatt, verður revsaður við varðhaldi ella, um nøkur avsakan er, við sekt. Hevur hann í hesum starvi bara sýnt stórt gáloysi, verður hann sektaður.

*2. stk.* Hann, sum annars við vilja veitir hjálp til at gera slíkt, sum nevnt er í 1. punktum í 139. gr. 1. stk., og hann, sum til nýtslu í eftirlitinum við skattaálíkningini við vilja gevur rangar upplýsingar, ella sum við vilja hjálpir í hesum, verður revsaður við sekt, ella, er svikið serstakliga stórt við varðhaldi.

**prg. 140.** Den, der erhvervsmæssigt bistår en skattepligtig med affattelsen af dennes selvangivelse til brug for de skatteligningende myndigheder, og som ved denne sin virksomhed søger at unddrage det offentlige skyldig skat, straffes med hæfte eller, under formildende omstændigheder, med bøde. Er der ved den omhandlede virksomhed alene udvist grov uagtsomhed, er straffen bøde.

*Stk. 2.* Den, der iøvrigt forsætlig medvirker til et forhold af den i prg. 139, stk. 1, første punktum nævnte art, samt den, der til brug ved kontrollen med skatteligningen forsætlig afgiver urigtige oplysninger, eller som forsætligt medvirker hertil, straffes med bøde eller, i særlige grove tilfælde, med hæfte.

**141. gr.** Í málum, har ið persónur eftir 139. og 140. gr. má ætlast at koma undir revsing, er landsstýrinum heimilt at krevja, at løgreglan hjálpir líkningarvaldinum at fáa málið greitt.

**prg. 141.** I sager, hvor strafansvar efter prg. 139 og 140 må antages at være forskyldt, kan landsstyret forlange, at politiet bistår de skatteligningende myndigheder med sagens opklaring.

**142. gr.** Hann, sum verður dømdur sekur í misbroti, sum umrøtt er í 139. gr., skal umframt sektina, sum har er ásett, gjalda aftaná tann skatt, sum hann hevur goldið ov lítið; tey feløg v.m., sum umrødd eru í 1. gr. nr. 8-14, skulu harafturat gjalda 12% p.a. í rentu frá tí, at skattaárið, sum kravið er galdandi fyri, gekk út.

*2. stk.* Somu skyldu til at gjalda skatt aftaná, sum er undandrigin, møguliga við rentu, eins og nevnt er í 1. stk., hevur hvør tann, sum upplýst verður um, at hann ikki hevur verið skattaður av allari inntøku síni, uttan at hann tó hevur gjørt nakað til sakar, sum revsing er løgd við. Verður málið ikki við samtykki landsstýrisins avgjørt við sátt og semjing, leggja dómstólarnir á, hvussu stóra skattaupphædd hann skal gjalda aftaná. Tá renta av eftirkravinum verður roknað, verður hon bert roknað av sjálvum eftirgjaldinum og ikki av eykagjaldinum, sum verður lagt afturat eftir 106. gr.

*3. stk.* Skattupphæddin eftir hesari grein fellur til gjaldingar tann 1. í mánaðinum aftan á, at rokning er send av gjaldstovuni, og hevur skattgjaldari gjaldfrest til 20. í mánaðinum, og verður kravt sambært reglunum í 76. gr. 1. og 2. stk. Skattgjaldið og eykagjaldið ber til at innheinta við panting smb. 135 gr.

**prg. 142.** Foruden at ifalde bødeansvar er den, som kendes skyldig i et forhold, der falder ind under prg. 139, forpligtet til at efterbetale den for lidt erlagte skat, forsåvidt angår de i prg. 1, nr. 8-14 omhandlede selskaber og foreninger m.v. med tillæg af renter 12% p.a. fra udgangen af det skatteår, som kravet vedrører.

*Stk. 2.* Samme forpligtelse til at efterbetale den for lidt erlagte skat evnt. med renter som anført i stk. 1, påhviler enhver, om hvem det oplyses, at han, uden at have gjort sig skyldig i et strafbart forhold, ikke har været beskattet af sin fulde indkomst. Størrelsen af det skattebeløb, der skal efterbetales, bliver, forsåvidt sagen ikke med landsstyrets samtykke afgøres i mindelighed, at fastsætte ved domstolene. Ved beregningen af renter af efterkravet vil der være at bortse fra evt. tillæg til dette i medfør af prg. 106.

*Stk. 3.* Skattebeløbet efter nærværende paragraf forfalder til betaling den 1. i måneden efter, at kravet er udsendt fra skattemyndighederne. Den skattepligtige har betalingsfrist til den 20. i måneden, og skattebeløbet opkræves iflg. bestemmelserne i prg. 76, stk. 1 og 2. Skattebeløbet samt efterbetalingsbe-

3. stk., og fyri henda skatt gildir sami forgongurættur í deyðs- og trotabúgvum sum fyri annan skatt.

**143.** gr. Kemur tað í ljósmála, aftan á at skattgjaldari er deyður, at hann hevur goldið ov lítlan inntøkuskatt, tá skal altíð verða goldin tvíføld tann peningshædd, sum í vantar. Sama er, tá skattgjaldarin, meðan hann var á lívi, er saksøktur vegna eftirkrav eftir skatti, sum hann hevur goldið ovlítið, men er deyður, áðrenn málið er lokið.

*2. stk.* Hesa ábyrgd, ið nevnd er í 1. stk., ber búgvið ella arvingarnir; arvingarnir tó einans í tann mun, teir hava tikið við arvi ella fingið arv greiddan frammanundan. Innan fyri hetta mark bera arvingarnir við tí undantaki, ið nevnt er í 127. gr. 2. stk. í síðstu málsgrein, samábyrgd av tí, at skatturin verður goldin, og ber til at heinta hann inn við panting hjá teimum, um tað verður neyðugt. Livir hjúnafelagi eftir hin deyða, hvørs ognir ikki verða tiknar upp í viðgerðina av búnum, tá ber til, um eftirskatturin ikki fæst goldin úr búnum ella frá arvingunum innan fyri vanliga pantingarfreist, at innheinta hann við panting úr ognunum hjá tí eftirlivandi hjúninum í

løbet kan inddrives ved udpantning, jfr. prg. 135, stk. 3, og der haves samme fortrinsret for beløbet i dødsboer og konkursboer som for skatter.

**prg. 143.** Såfremt det, efter at en skatteyder er afgået ved døden, viser sig, at han har betalt for lidt i indkomstskat, vil skatten altid være at efterbetale med tillæg, svarende til den for lidt erlagte skat. Det samme gælder i tilfælde, hvor en sag angående efterkrav på for lidt erlagt skat er rejst mod skatteyderen i hans levende live, men hvor han er afgået ved døden inden sagens afslutning.

*Stk. 2.* Det i stk. 1 nævnte tilsvar påhviler boet eller arvingerne, disse sidste dog kun i det omfang, hvor de har modtaget arv eller arveforskud. Inden for denne grænse er arvingerne med den i prg. 127, stk. 2, sidste punktum, nævnte undtagelse solidarisk ansvarlige for tilsvaret, der kan inddrives ved udpantning hos de pågældende. Såfremt afdøde efterlader sig ægtefælle, hvis midler ikke inddrages under bobehandlingen, kan tilsvaret, hvis dækning ikke kan opnås hos boet eller arvingerne, indenfor den sædvanlige udpantningsfrist inddrives ved udpantning i den længstlevende ægtefælles midler i det omfang, hvori tilsvaret hidrører fra skatteperioder, for hvilke ægtefæl-

tann mun, kravið hevur sín uppruna frá skattaskeiði, tá hjúnini vórðu skattað saman.

*3. stk.* Dómstólarnir áseta ta peningshædd, ið skal verða goldin aftaná, um málið ikki við samtykki landsstýrisins verður avgjørt við sátt og semju.

*4. stk.* Tann skylda, ið sambært tí, ið frammanfyri er ásett, hvílir á búnum ella arvingunum, verður ikki skerd av innkallan við proklama.

lerne har været sambeskattede.

*Stk. 3.* Størrelsen af det beløb, der skal tilsvares, bliver, forsåvidt sagen ikke med landsstyrets samtykke afgøres i mindelighed, at fastsætte ved domstolene.

*Stk. 4.* Den boet eller arvingerne i henhold til foranstående bestemmelser påhvilende forpligtelse påvirkes ikke af et i boet udstedt proklama.

**144. gr.** Tá viðurskiftini í stórum mæla fyri tí, soleiðis tá trongd er, hevur landdstýrið heimild til at geva upp ella lækka eftirkrav, ið ásett er eftir 142. og 143. gr., somuleiðis eisini sektir og eykagjøld, ið áløgd eru eftir reglunum í hesum kapitli. Viðvíkjandi teimum eftirkrøvum, sektum og eykagjøldum, ið falla til kommununa, hevur bygda(r)ráðið somu heimild til at geva upp ella lækka.

**prg. 144.** Landsstyret kan, når forholdene i særlig grad taler derfor, således navnlig i trangstilfælde, eftergive eller nedsætte et efter prg. 142 og 143 fastsat efterkrav såvel som de af landsstyret efter reglerne i nærværende kapitel fastsatte bøder og straftillæg. Forsåvidt angår de kommunen tilfaldende efterkrav, bøder eller straftillæg kan kommunen eftergive eller nedsætte disse.

**145. gr.** Tann í 103. gr. 3. stk. umtalaða sekt kann eftir teimum vanligu reglunum verða innheintað við panting.

*2. stk.* Hann, sum ikki ger eftir teirri fyriskipan, sum er fráboðað av landsstýrinum sambært 103. gr. 2. stk. um at halda roknskap, ella sum ger seg sekan í stórari ógreiðslu við at halda slíkan roknskap, ella við at goyma hetta saman við øllum

**prg. 145.** Den i prg. 103, stk. 3, omtalte bøde kan inddrives ved udpantning efter de sædvanlige regler.

*Stk. 2.* Den, der ikke efterkommer et af landsstyret i medfør af prg. 103, stk. 2, meddelte pålæg om at føre regnskab, eller som gør sig skyldig i grov uorden med hensyn til førelsen af sådant regnskab eller ved den opbevaring af dette med tilhø-

teimum skjølum, sum ásett verða í krøvunum, kann verða døndur í sekt.

**146. gr.** Revsaður við sekt verður tann, sum við vilja ella við stórum gáloysni

1) letur vera við at avrokna A-inntøku gjøgnum tey av landsstýrinum góðkendu avrokningarstøð, jnt. 63. gr., ella ikki heldur eftir avgjaldi í vinningsbýti sambært 30. gr.,

2) letur vera við at geva tær í 30. gr. umrøddu upplýsingar,

3) gevur rangar ella villleiðandi upplýsingar um tey í 30. gr. umrøddu viðurskifti,

4) ikki uppfyllir tær í 118. gr. nevndu skyldur. Sektir upp til 5.000 kr. kunnu tó áleggjast av líkningarráðnum.

**147. gr.** Somuleiðis, sum rætt er um í 146. gr., verður tann sektaður, sum

1) tekur ímóti A-inntøku, sum hann er vitandi um, at A-skattur sum ásett ikki er avroknaður í,

2) við vilja ella við stórum gáloysi gevur rangar ella villleiðandi upplýsingar, sum nýtast skulu til avgerðir eftir 60. gr. 3. og 4. stk., 63. gr. 4. stk., 68. gr., 80. gr. ella 82. gr. ella í sambandi við eina í hesum reglum nevndu umsóknum dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri, hvussu málið verður loyst.

rende bilag, der foreskrives i kravene, kan idømmes bøde.

**prg. 146.** Med bøde straffes den, der forsætligt eller ved grov uagtsomhed

1) undlader at opfylde sin pligt til at anvise A-indkomst gennem de af landsstyret godkendte afregningssteder jfr. prg. 63, eller ikke tilbageholder afgift af udbytte iflg. prg. 30,

2) undlader rettidigt at afgive de i prg. 30, stk. 3, omhandlede oplysninger,

3) afgiver urigtige eller vildledende oplysninger om de i prg. 30 omhandlede forhold,

4) undlader at opfylde de i prg. 118 nævnte pligter. Bøder af indtil 5.000 kr. kan dog ikendes af ligningsrådet.

**prg. 147.** På samme måde som anført i prg. 146 straffes den, der

1) lader sig udbetale A-indkomst vidende om, at der ikke er indeholdt A-skat som påbudt,

2) forsætlig eller ved grov uagtsomhed afgiver urigtige eller vildledende oplysninger til brug for afgørelser efter prg. 60, stk. 3 og 4, prg. 63, stk. 4, prg. 68, prg. 80 eller prg. 82 eller i forbindelse med en af de i disse bestemmelser nævnte ansøgninger fortier oplysninger af betydning for sagens afgørelse.

**148. gr.** Í teimum fyriskipanum, sum verða gjørdar sambært hesi lóg, kann sekt eisini verða áløgd fyri ikki at halda ásetingarnar í fyriskipanini.

**149. gr.** Er eitt av teimum í 146. og 148. gr. umræddu lógarbrotum gjørt av einum partafelag v.m. ella tílíkum, kann verða álagt felagnum sektarábyrgd.

**150. gr.** Um lógarbrotið ikki verður mett at hava við sær onnur tiltøk enn sekt, kann landsstýrið ella tann, landsstýrið gevur heimild til tess, boða honum, sum hetta viðvíkur, at málið kann verða avgjørt uttan rættarviðgerð, um so er, at hann viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og váttar, at hann innan eina nærri ásetta freist, sum eftir áheitan kann verða longd, vil gjalda eina í fráboðanini tilskilaða sekt.

*2. stk.* Verður sektin goldin rættstundis, ella verður hon, aftan á at hon er góðtikin, innheintað, falla øll krøv um seinni revsing burtur.

**prg. 148.** I forskrifter, der udfærdiges i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelserne i forskrifterne.

**prg. 149.** Er en af de i prg. 146 og 148 nævnte lovovertrædelser begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

**prg. 150.** Såfremt overtrædelsen ikke skønnes at ville medføre højere straf end bøde, kan landsstyret eller den, landsstyret bemyndiger dertil, tilkendegive den pågældende, at sagen kan afgøres uden retslig forfølgning, såfremt han erkender sig skyldig i overtrædelserne og erklærer sig rede til inden for en nærmere angivet frist, der efter anmodning kan forlænges, at betale en i tilkendegivelsen angivet bøde.

*Stk. 2.* Betales bøden i rette tid, eller bliver den efter vedtagelsen inddrevet, bortfalder videre forfølgning.

## 15. kapittul

### Ymisk fyrimæli

**151. gr.** Skattavaldinum, herundir eins væl líkningarvaldini sum limir í landsskattanevndini og tey, ið innheinta, er bannað, undir ábyrgd á borgaraligari revsilóg fyri Føroyar, at siga óviðkomandi frá nøkrum av tí, sum teir fáa at vita um inntøku- og ognarviðurskifti, vinnuviðurskifti ella viðurskifti, sum viðkoma heimlívinum hjá skattskyldugum ella ávísingarskyldugum, meðan teir røkja starv sítt sambært hesi lóg. Tað sama hevur gildi fyri tað hjálparfólk, sum starvar hjá skattavaldinum, og annars hvønn og ein, sum hevur gjørt avtalu við tað almenna um at átaka sær eitt arbeiði og fær at vita um slík viðurskifti. Er avtalan gjørd við eitt virki, so fevnir tagnarskyldan um øll tey í virkinum, sum fáa at vita um slík viðurskifti.

*2. stk.* Tey, sum koma undir hetta, skulu, tá tey taka við starvi, skrivliga lova at halda hesa tagnarskyldu.

*3. stk.* Almannakunngerð av tílíkum, sum eftir lóg ikki er loyvt at gera almannakunnugt, sbr. 91. gr., verður revsað við

## Kapitel 15

### Forskellige bestemmelser

**prg. 151.** Skattemyndighederne, herunder såvel ligningsmyndighederne som landsskatteudvalgets medlemmer og opkrævningsmyndighederne skal under ansvar efter borgerlig straffelov for Færøerne iagttage ubetinget tavshed over for uvedkommende med hensyn til de oplysninger vedrørende skattepligtiges eller anvisningspligtiges økonomiske, erhvervsmæssige eller privatlivet vedrørende forhold, som de under varetagelse af deres funktioner efter denne lov kommer til kundskab om. Det samme gælder de hos skattemyndighederne ansatte eller af dem antagne medhjælpere samt iøvrigt enhver, der som følge af et i henhold til aftale med det offentlige påtaget arbejde kommer til kundskab om sådanne forhold. Er aftalen indgået med en virksomhed, omfatter tavshedspligten alle, der under deres arbejde i virksomheden får kundskab om sådanne forhold.

*Stk. 2.* De pågældende afgiver ved deres tiltrædelse af hvervet eller stillingen skriftlig erklæring om at ville overholde tavshedspligten.

*Stk. 3.* Offentliggørelsen af forhold, som efter denne lov ikke må offentliggøres, jfr. prg. 91, straffes med bøder. Påtale

sektum. Ákæra kann reisast, bæði um skattgjaldarin ella um landsstýrið krevur tað.

**152. gr.** Hevur kommunala líkningarvaldið ikki, áðrenn tær ásettu freistir eru lidnar, greitt úr hondum tað, ið henda lóg býður teimum at gera, er landsstýrinum heimilt, fyri at fáa tey at gera sína skyldu, at áleggja hvørjum limi dagsekt, sum ikki hevur fullgóða avsakan.

**153. gr.** Hvørjum tí persóni, sum eftir greinunum 21. 2. stk., 103. 3. stk., 104. 1. stk., 125. 4. stk., 126. 1. stk., 127. 1. stk., 139. 1. stk., 140., 143. 1. stk., 145. 2. stk., 146., 147., 148., 149., 151. 3 stk. og 152. verður áløgd sekt, er loyvt innan 14 dagar eftir, at hann hevur fingið boð um sektina, at krevja málið avgjørt av rættinum.

*2. stk.* Sektir eftir hesi lóg falla til landskassan, har ið annað ikki er ásett.

**154. gr.** Í føri persónar ella felløg v.m., sum eru skattskyldug eftir hesi lóg, eisini verða skattað í Danmark, Grønlandi og øðrum ríki av somu inntøku, sum skattur er lagdur á í Føroyum, skal landsstýrinum vera heimilt at hjálpa til sáttmálagerð við Danmark, Grønland ella annað ríki, til tess alvegis ella fyri ein part at komast undan hesi tvífoldu

kan ske såvel efter skatteyderens som landsstyrets begæring.

**prg. 152.** Den kommunale ligningsmyndighed, som ikke inden udløbet af de fastsatte frister efterkommer, hvad der ifølge denne lovs forskrifter påhviler den, kan af landsstyret under en daglig bøde for hvert enkelt medlem, der ikke kan anføre fyldestgørende grunde til sin undskyldning, tilpligtes hertil.

**prg. 153.** Det står enhver, som i henhold til prg. 21, stk. 2, 103, stk. 3, 104, stk. 1, 125, stk. 4, 126, stk. 1, 127, stk. 1, 139, stk. 1, 140, 143, stk. 1, 145, stk. 2, 146, 147, 148, 149, 151, stk. 3, og 152 ikendes bøde, frit for inden 14 dage efter, at han har modtaget underretning om bødens ikendelse, at forlange sagen afgjort ved retslig påtale.

*Stk. 2.* Når ikke andet er fastsat, tilfalder bøden efter nærværende lov landskassen.

**prg. 154.** For det tilfælde, at personer, selskaber eller foreninger, som er skattepligtige efter nærværende lov, tillige er undergivet beskatning i Danmark, Grønland og fremmed skat af samme indkomst, som beskattes på Færøerne, skal landsstyret være bemyndiget til at medvirke til indgåelse af overenskomst med Danmark, Grøn-

skattaálíkning og til tess at játta tær broytingar í skattskylduni eftir hesi lóg, sum til hetta tørvast, um somu játtanir fáast aftur ímóti.

*2. stk.* Skattur, sum er goldin øðrum ríki av inntøku haðan, har avtala sbr. 1. stk. ikki er gjørd, annaðhvørt skatturin er beinleiðis álíknaður ella afturhildin, kann verða drigin frá í tí inntøkuskatti, sum latin skal verða í Føroyum av hesari inntøku. Frádrigin kann tó ikki verða meira enn tann skattur, sum lutfalsliga fellur á ta í Danmark, Grønlandi ella øðrum ríki skattaðu inntøkuna, sum eisini er skattað í Føroyum.

**155. gr.** Landsstýrið kann, um samsvarandi játtanir fáast aftur ímóti í sáttmála við Danmark, Grønland ella annað ríki, játta slíkar broytingar í skylduni til at greiða skattir til tað almenna, at tað kemst undan hesi tvíføldu skattaálíkning, sum samsvarandi játtanir fáast afturímóti.

*2. stk.* Har sáttmáli er gjørdur ella skal gerast um at sleppa undan tvinnanda skatting, kann landsstýrið, um samsvarandi játtanir fáast aftur ímóti í sáttmála við Danmark, Grønland ella avvarðandi fremmanda ríki, samtykkja reglur um,

1) at føroyskt yvirvald skal

land og fremmed stat til hel eller delvis undgåelse af nævnte dobbeltbeskatning og til under forbehold af gensidighed at tilstå de hertil fornødne ændringer i skattepligten efter de nævnte love.

*Stk. 2.* Skat, som er betalt til fremmed stat, hvormed ingen aftale jfr. stk. 1 foreligger, af indkomst stammende fra denne stat, enten ved direkte påligning eller ved indeholdelse, kan fradrages i den indkomstskat, som skal tilsvares på Færøerne af denne indkomst. Fradraget kan dog ikke være større end den skat, som forholdsmæssig falder på den i Danmark, Grønland og vedkommende fremmede stat beskattede indkomst; der er pålignet på Færøerne.

**prg. 155.** Landsstyret kan under forhold af gensidighed ved overenskomst med Danmark, Grønland eller fremmed stat tilstå sådanne lempelser i pligten til at udrede skatter til det offentlige, at dobbeltbeskatning helt eller delvis undgås.

*Stk. 2.* Hvor overenskomst til undgåelse af dobbeltbeskatning er indgået eller indgås, kan landsstyret under forbehold af gensidighed ved overenskomst med Danmark, Grønland eller vedkommende fremmed stat vedtage bestemmelser om,

1) at færøske myndigheder

biðja um og fráboða upplýsingar til brúk hjá skattamyndugleikunum í donskum, grønlendskum ella avvarðandi fremmanda ríki, sum eru umrøddir í slíkum sáttmálum, ella tá avgerðir skulu takast um aðrar skattir, avgjøld v.m., sum verða innheintaðir av tí almenna, ella hvar lógin annars gevur loyvi til, at hesir skattir verða pantaðir.

2) at skattakrøv og krøv um avgjøld av teimum sløgum, sum eru umrødd í slíkum sáttmálum, og sum er álíknað í Danmark, Grønlandi ella avvarðandi fremmanda ríki, og kunnu verða innheintað í teimum, skulu kunna verða innheintað í Føroyum eftir somu reglum, sum galda her fyri innheinting av slíkum krøvum. Við somu treytum kunnu eisini reglur gerast um innheinting av øðrum skattum og avgjøldum v.m., sum verða innheintað av tí almenna, ella sum lógin loyvir verða pantað.

3) at í inntøku, sum verður útgoldin av persónum, feløgum v.m. ella fulltrúum fyri slík, og sum hava heimating í Føroyum, skal skattur kunna verða eftirhildin til danskar ella grønlendskar myndugleikar ella myndugleikar í fremmandum ríki, smb. 66. gr.

*3. stk.* Skattur, sum er goldin í Grønlandi av inntøku haðani,

skal indhente og meddele oplysninger til brug for danske, grønlandske eller vedkommende fremmede stats myndigheder ved påligningen af skatter og afgifter af den i dobbeltbeskatningsaftalen omhandlede art samt ved fastsættelsen af andre skatter, afgifter og ydelser, der opkræves eller inddrives af det offentlige, eller som i lovgivningen er tillagt udpantningsret

2) at krav på skatter og afgifter af den i dobbeltbeskatningsaftalen omhandlede art, der er pålignet i Danmark, Grønland eller i vedkommende fremmed stat og kan inddrives i denne, skal kunne inddrives på Færøerne efter de for inddrivelse og opkrævning af tilsvarende eller lignende færøske skatter og afgifter gældende regler. Tilsvarende bestemmelser kan under de anførte betingelser vedtages med hensyn til krav på andre skatter, afgifter og ydelser, der opkræves eller inddrives af det offentlige, eller som i lovgivningen er tillagt udpantningsret.

3) at der i indkomst, som udbetales af en person, et selskab m.v. eller befuldmægtiget for disse, der har hjemting på Færøerne, skal kunne foretages indeholdelse af kildeskat til danske, grønlandske eller vedkommende fremmede stats myndigheder, jfr. iøvrigt prg. 66.

*Stk. 3.* Skat, som er betalt i Grønland af indkomst, stam-

antin hann er beinleiðis álíknaður ella afturbildin, kann verða drigin frá tí inntøkuskatti, sum latin skal verða í Føroyum av hesari inntøku. Frádrigið kann tó ikki verða meira enn skatturin, sum lutfalsliga fellur á ta í Grønlandi skattaðu inntøkuna, sum eisini er skattað í Føroyum.

*4. stk.* Landsstýrinum er eisini heimilt at seta reglur fyri, í hvønn mun myndugleikar aðrastaðni í kongsríkinum skulu kunna útinna tað eftirlit, ið umrøtt er í 12. kapitli.

**156. gr.** Landsstýrið hevur heimild til, tá umstøðurnar almikið tala fyri tí, at geva eftir ella lækka landsskatt, sum er endaliga álíknaður sum írestandi skattur eftir hesi lóg.

**157. gr.** Bygda(r)ráðunum er einans loyvt at geva eftir persónligan endaliga álíknaðan kommunuskatt v.m. í serstøkum førum, tá inntøka skattgjaldarans av sjúku, andláti, tungum húsi, vinnuloysi ella øðrum tílíkum umstøðum hevur verið stóran mun minni enn inntøkan í tí ári, írestandi kommunuskatturin er álíknaður eftir, og tá fíggjarligu kor hansara annars mugu ætlast at vera til hindurs fyri, at hann fær goldið allan tann álíknaða írestandi

mende fra Grønland, enten ved direkte påligning eller ved indholdelse, kan fradrages i den indkomstskat, som skal tilsvares på Færøerne af denne indkomst. Fradraget kan dog ikke være større end den skat, som forholdsmæssigt falder på den i Grønland beskattede indkomst, der er pålignet Færøerne.

*Stk. 4.* Landsstyret er endvidere bemyndiget til at fastsætte regler for, i hvilket omfang de i kapitel 12 omhandlede kontrolbeføjelser på Færøerne skal kunne udøves af myndigheder i det øvrige kongerige.

**prg. 156.** Landsstyret er beføjet til når forholdene i ganske særlig grad taler derfor, at eftergive eller nedsætte landsskat, der er pålignet som restskat ved slutopgørelsen i henhold til nærværende lov.

**prg. 157.** Eftergivelse af pålignede skatter m.v. til kommunen kan kun finde sted i ganske særlige tilfælde, når den skattepligtiges indtægt som følge af sygdom, dødsfald, trykkende familieforhold, arbejdsløshed eller andre lignende forhold er blevet væsentlig mindre end indkomsten i det år, restskatten er pålignet for, og den pågældendes økonomiske omstændigheder iøvrigt skønnes at være til hinder for betaling af de fuldt pålignede restskatter. Om efter-

skattin. Umsókn um at fáa skatt eftirgivnan skal verða send bygda(r)ráðnum skrivliga, í kommunum við fastari socialnevnd skal umsóknin sendast til hesa, og avgerð um hetta skal — tá neyðturviligar upplýsingar eru fingnar til vega — verða tikin á bygda(r)ráðsfundi.

givelsen skal der indgives skriftligt andragende til kommunalbestyrelsen, i kommuner med socialudvalg sendes andragendet til dette udvalg, og beslutningen om skatteeftergivelse skal — efter at de fornødne oplysninger er tilvejebragt — træffes af kommunalbestyrelsen i et af sammes møder.

## 16. kapittul

### Nær lógin fær gildi. Bráðfeingis fyrimæli.

**158. gr.** Landsstýrið setur nærri reglur fyri, hvussu henda lóg skal verða framd.

**159. gr.** Øll mál viðvíkjandi skattgjaldi fyri skattaskeiði, áðrenn henda lóg kemur í gildi, og sakarábyrgd fyri upplýsingar, sum givnar eru, áður enn henda lóg kemur í gildi, skulu framvegis verða viðgjørd eftir higartil galdandi reglum, um so er, at annað ikki er ásett í løgtingslóg.

**160. gr.** Nær henda lóg fær gildi, verður ásett við kunngerð frá Føroya Landsstýri.

## Kapitel 16

### Ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.

**prg. 158.** Landsstyret fastsætter de nærmere regler for denne lovs gennemførelse.

**prg. 159.** Alle spørgsmål om skattesvarelse for skatteperioder inden denne lov træder i kraft, og strafansvar for oplysninger, afgivet inden denne nærværende lovs ikrafttræden, skal vedvarende behandles efter hidtil gældende regler, ifald ikke andet bestemmes ved lagtingslov.

**prg. 160.** Tidspunktet for lovens ikrafttræden fastsættes ved bekendtgørelse fra Færøernes Landsstyre.

**161.** gr. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 við seinni broytingum um landsskatt og kommunuskatt og 45. gr. í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommununurnar.

*2. stk.* Tær eftir lógini frá 2. juli 1963 givnu kunngerðir v.m. verða framvegis í gildi, í tann mun tær ikki ganga móti hesi lóg.

**Prg. 161.** Samtidig ophæves lagtingslov nr. 50 fra 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer og prg. 45 i lagtingslov nr. 45 fra 29. juni 1972 om færøske kommuner.

*Stk. 2.* De i henhold til lagtingsloven fra 2. juli 1963 givne bekendtgørelser m.v. forbliver fremdeles i kraft i den udstrækning, de ikke går imod denne lov.

## Viðmerkingar til lógaruppskotið

Lógaruppskotið, sum nú verður lagt fyri tingið, er úrslit av tí arbeiði, sum tey seinastu árini hevur verið gjørt fyri at gera okkara skattaskipan meira effektiva. Fyri at sleppa undan øllum teimum trupulleikum, sum núverandi skipan hevur, hvat innkrevjing av skatti viðvíkur, verður skotið upp at leggja okkara skattaskipan um til samtíðarskatt, soleiðis at tann persónligi skatturin nú verður goldin so skjótt sum gjørligt, aftaná at skattskylduga inntøkan er vunnin. Við øðrum orðum verður í lógaruppskotinum roynt at gera tíðarskeiðið, frá tí inntøkan er vunnin, og til skatturin er útroknaður og goldin, so stutt sum møguligt.

Hóast hesa roynd sleppa vit ikki undan at gera eina endaliga inntøkuuppgerð, tá inntøkuárið er lokið. Út frá hesi inntøkuuppgerð verður so endaligi skatturin útroknaður. Við tí kumulativu skipan, vit fara at nýta eftir hesum uppskoti, skuldi hjá flestum skattgjaldarum, sum bert hava vanliga lønarinntøku, endaligi skatturin verið goldin, tá inntøkuárið er lokið. Serliga tí skipanin er soleiðis løgd til rættis, at um broytingar henda eitt nú á frádráttarsíðuni hjá einum skattgjaldara í árinum, kann hann fáa tær tiknar við inn í ta leypandi árligu útrokningina av skattinum.

Sambært núgaldandi skattareglum verður inntøkuskatturin goldin av inntøkuni, sum er vunnin í árinum framman undan skattaárinum. Hesi viðurskifti hava havt við sær fleiri vansar bæði fyri skattaborgaran og tað almenna. Fyri skattaborgaran kemur tað ofta fyri, at inntøkugrundarlagið er munandi lægri í tí skattaári, tá skatturin skal gjaldast, enn tað var í tí ári, sum skatturin er roknaður út eftir.

Møguleikin hjá skattaborgaranum at gjalda skattin er tá ikki so stórur, sum roknað varð við, tá skatturin varð líknaður. Hetta vísir seg ofta at hava ført skattaborgarar út í fíggjarligar trupulleikar við tí úrsliti, at skattaeftirstøðan er vaksin so nógv, at smáir møguleikar hava verið at fingið skattin inn.

Fyri tað almenna hevur tað langa tíðarskeiðið, frá tí at inntøkan er vunnin, og til skatturin fellur til gjaldingar, havt við sær, at skattamissurin kann verða rættiliga stórur. Núverandi skipan hevur havt við sær, at um ein persónur flutti av landinum í skattaárinum, fullu eftirverandi gjøld ikki til gjaldingar, og tá hetta ofta hava verið persónar við høgari inntøku, hevur missurin fyri tað almenna verið stórur. Í tíðarskeiðum við fallandi inntøkumøguleikum kann missurin hjá tí almenna koma upp á rættiliga stórar upphæddir. Ein partur av hesum eftirstøðum er tað almenna noytt at krevja inn við panting, sum hevur havt stórar útreiðslur við sær, samstundis sum hesar umstøður hava lagt eykabyrðar á sjálva skattafyrisitingina. Harafturat kemur, at tað almenna má eftirgeva munandi upphæddir orsakað av tíðarmuninum millum, nær inntøkan, sum skatturin verður líknaður av, er vunnin, og nær hann fellur til gjaldingar. Her kann eisini verða nevnt, at gr. 22a í núverandi skattalóg eisini hevur ført til skattamiss fyri tað almenna.

Tá ábøtur skulu gerast í skattalógini, sum skulu taka hædd fyri teimum vansum í núverandi skattaskipan, sum nevndar eru frammanfyri, má endamálið verða, at skatturin, so langt tað er gjørligt, verður goldin samstundis, sum skattskylduga inntøkan verður vunnin.

*Yvirlit yvir tær broytingar, sum verða uppskotnar í hesi lóg*

Her skal bert verða gjørdur ein samandráttur av teimum broytingum, sum mælt er til í hesum uppskoti, samanborið við núgaldandi lóg. Nágreinligari viðmerkingar verða seinni gjørdar til hvørt kapittul sær.

Tann uppkrevjingarskipan, sum her verður skotin upp, er galdandi bæði fyri lands-, kommunu- og kirkjuskatt, har hesir verða álíknaðir. Endamálið við uppskotinum er, at hesir skattir skulu verða uppkravdir so gott sum samstundis, sum skattskylduga inntøkan verður vunnin. Skattir, sum verða goldnir soleiðis, eru í veruleikanum fyribilsskattir og skulu mótroknast í teirri álíkning, sum verður gjørd, tá inntøkuárið er lokið. Við tí kumulativu skipan, sum her verður uppskotin, skuldi fyribilsskattur og endaligur álíknaður skattur samsvarað fyri størsta partin av skattaborgarunum. Tá slík skipan fer at hava við sær, at tá árið er farið, kenna skattamyndugleikarnir í

flestum førum bæði inntøkuna og frádráttirnar, so kann ein sjálvuppgáva verða send skattgjaldaranum við hesum upplýsingum á. Samsvara hesar upplýsingar so við tær upplýsingar, sum skattgjaldarin hevur, kann hann bert skriva undir sjálvuppgávuna og senda hana inn aftur til líkningarmyndugleikarnar. Hetta er tó bert galdandi fyri teir, sum hava vanliga lønarinntøku. Fyri aðrar skattaborgarar, sum hava sokallaða B-inntøku, verður skattgjaldingin altíð ein á conto gjalding, sum verður endaliga álíknað, tá inntøkuárið er lokið. Bæði fyri A- og B-skattaborgarar verður ein møguligur írestandi skattur uppkravdur og ein møguligur avlopsskattur afturgoldin, tá endaliga líkningin er gjørd.

Hann, ið rindar lønir, samsýningar v.m., skal síggja til, at A-skatturin verður goldin tí almenna um ávís avrokningarstøð. Hetta verður gjørt á tann hátt, at hann avroknar alla løn v.m. um tey avrokningarstøð, sum av landsstýrinum verða góðkend til slík endamál. Hesi halda skattinum eftir og gjalda nettolønina út aftur til tann, sum hevur ávíst bruttolønina. Hann, ið rindar lønina, kann so gera avtalu við løntakaran, um hesin vil hava lønina ávísta á konto í peningastovnunum ella útgoldna kontant.

Tær inntøkur v.m., sum fyribilsskattur skal eftirhaldast í, eru nevndar í 60. gr. í lógaruppskotinum. Í hesum sambandi er tað løn, hýra v.m. og inntøka av slíkum slag, sum kann metast at vera nettoinntøka hjá skattgjaldaranum, tá hon verður útgoldin. Allar hesar inntøkur verða í lógaruppskotinum nevndar A-inntøkur, og fyribilsskatturin, sum eftirhaldast skal í hesum lønum, verður nevndur A-skattur. Aðrar inntøkur, sum fyribilsskattur ikki skal avroknast í, verða í lógaruppskotinum nevndar B-inntøkur. Fyribilsskattin av hesum inntøkum skal skattgjaldarin sjálvur gjalda í árinum við skattarokning. Hesin fyribilsskattur verður í uppskotinum nevndur B-skattur. Størsti parturin av sokallaðu B-inntøkunum kemur frá teimum, sum reka sjálvstøðuga vinnu og byggja sjálvuppgávu sína á roknskap. Her skal tó viðmerkjast, at lønarinntøka vunnin uttanlands av persónum, sum eru undir skattskyldu í Føroyum, eisini verður roknað sum B-inntøka, og koma slíkir persónar at verða fyribilsskattaskrásettir av eini av teimum mettari inntøku. Her kemur tað stórt sæð at snúgva seg um persónar, sum eru við fremmandum skipum, og sum ikki koma undir donsku sjómansskattaskipanina.

Inntøka, sum stavar frá vinningsbýti frá feløgum v.m., sum eru skrásett í Føroyum, verður hvørki roknað sum A- ella B-inntøka, tá henni verður álagt eitt fast endaligt avgjald. Sama er galdandi fyri

rentur í føroyskum peningastovnum.

»Ávísingarskyldugur« í uppskotinum er hann, sum skal ávísa lønina til avrokningarstøðini og gjalda skattin til teirra. »Avrokningarstøð«, sum skulu góðkennast av landsstýrinum, verða tey nevnd í uppskotinum, sum skulu syrgja fyri, at skatturin verður avroknaður og fluttur til tað almenna. Hesi avrokningarstøð skulu senda tær upplýsingar um lønir hjá hvørjum einstøkum løntakara, sum hin ávísingarskyldugi kemur við til skattaútrokningarstaðið, sum so gevur ávísingarskylduga boð um, hvussu stór nettolønin er, hann skal útgjalda tí einstaka løntakaranum. Eisini er við í lógaruppskotinum, at ein skattaborgari eftir áheitan kann fáa upplýst frá skattavaldinum, hvussu stór tann upphædd er, ið hann kann vinna, áðrenn skattur verður avroknaður. Ofta fer hetta at verða galdandi fyri børn ella ungfólk, sum í frítíðini vinna eina minni upphædd. Hetta svarar stórt sæð til tað, teir í Danmark, Grønlandi, Noreg og Svørfki kalla »frikort«. Slíkt fríkort kemur eftir hesum uppskoti at svara til teir standardfrádráttir, sum liggja í skattaútrokningini, og møguligar frádráttir, sum skattgjaldarin sjálvur annars hevur. Fer inntøkan upp um hesa upphædd, verður skattur avroknaður eftir teimum vanligu reglunum.

Um skattaborgari hevur bæði A-inntøkur og B-inntøkur, verður A-skatturin eftir høvuðsregluni avroknaður í A-inntøkuni og B-skatturin goldin við skattarokning. Um B-inntøkan er av minni týdningi í mun til A-inntøkuna, kann líkningarráðið gera av, um B-skatturin verður avroknaður í A-inntøkuni, soleiðis at frádráttirnir verða minkaðir so mikið, sum svarar til B-skattin. Høvuðsreglan í uppskotinum gongur út uppá, at roknað skal verða við teirri væntaðu inntøkuni hjá einum skattaborgara sum grundarlag undir fyribilsskattinum í einum ári. Hjá B-skattaborgarum verður hetta altíð neyðugt, og her verður mett út frá seinastu endaliga álíknaðu inntøkuni hækkað við einum ávísum prosenttali, tó soleiðis, at har serlig viðurskifti gera seg galdandi, kunnu frávik verða gjørd frá høvuðsregluni. Hjá einum, sum bert hevur A-inntøku, verður ætlað um frádráttirnar í einum ári. Í uppskotinum verður eisini mælt til, at tað metta grundarlagið undir fyribilsskattinum kann verða broytt í árinum, um tað verður mett at verða neyðugt. Í uppskotinum verður eisini mælt til, at hin skattskyldugi kann gjalda inn skatt líka til 31. mars árið eftir uttan at skula gjalda rentu, um hann metir, at hann hevur goldið ov lítlan fyribilsskatt í inntøkuárinum.

Í tí kumulativu skipanini verður inntøkan hjá einum løntakara roknað upp til ársinntøku við hvørja lønútgjalding, sum kann

vera viku fyri viku ella mánað fyri mánað í øllum inntøkuárinum. Allir frádráttir verða roknaðir sum ársfrádráttir, sum verða beinleiðis frádrignir í inntøkuni (t.d. løntakara- og koyrifrádráttir), og teir frádráttir, sum skulu dragast frá í skattinum (t.d. privatar rentur o.a.). Hvørja ferð, skattur skal roknast av inntøkuni, verður tann til eina ársinntøku avroknaða inntøkan minkað við teimum árligu frádráttunum. Hetta er tann upproknaða skattskylduga inntøkan fyri alt inntøkuárið, og skatturin av hesi inntøkuni verður so útroknaður. Hesin skatturin verður síðan lutfalsliga niðurroknaður, soleiðis at hann svarar til tað tíðarskeið av árinum, lønin er fyri, og minkaður við tí skattinum, sum er eftirhildin við lønútgjaldingunum frammanundan. Munurin er so tann skattur, sum skal gjaldast við hesi ávísu lønútgjalding. Um tað vísir seg, at áður er ov nógvur skattur eftirhildin, t.d. kunnu sjúka og vinnuloysi gera, at eingin ella munandi minni inntøka kemur at verða restina av árinum, kann í slíkum førum peningurin gjaldast aftur beinanveg, um skattgjaldarin kann vísa skattavaldinum á hesi viðurskifti.

*Hvør kemur undir skipanina*

Eftir uppskotinum koma allir persónligir skattgjaldarar undir hesa skipan við samtíðarskatti; partafeløg og onnur juridisk feløg koma ikki undir skipanina, men fara at gjalda skatt sum nú av inntøkuni frá árinum fyri. Tó skal gjaldingin her falla í trimum gjøldum í oktober, november og desember og sjálvuppgávu latast inn í seinasta lagi 1. juni í skattaárinum. Fyrisitingarliga hevði tað givið nógvar trupulleikar, um t.d. eisini B-skattagjaldarar vóru hildnir uttan fyri samtíðarskattaskipanina, tí fyri tað fyrsta skifta hesir ofta vinnu í árinum, og fyri tað næsta kunnu teir hava bæði A-og B-inntøku í sama ári. Eisini kann ein løntakari í inntøkuárinum stovna sjálvstøðuga vinnu. Hartil kemur, at tað sjónarmið kann førast fram, at allir skattgjaldarar eftir meginreglunum eiga at verða viðgjørdir eins, so langt hetta letur seg gera.

*Skattafrádráttir og skattaútrokningin*

Í sjálvum lógaruppskotinum eru frádráttirnir, sum loyvt verður at draga frá í inntøkuni, tiknir við. Landsskattastigin, persónsfrádrátturin og barnafrádrátturin í landsskattinum og kommunuskattinum verða ásettir við serstakari løgtingslóg. Harafturímóti verður álagt kommununum at áseta bæði kommunu- og kirkju-

skattaprosentið fyri hvørt inntøkuár. Tá inntøkuárið er lokið, skal inntøkan gerast upp sum eftir núverandi skattaskipan, og endaligi skatturin verður so útroknaður. Um ov nógvur skattur tá er goldin, verður hann afturgoldin so skjótt sum gjørligt. Um ov lítil skattur er goldin, skal hann krevjast inn sum írestandi skattur eftir reglum, sum verða umtalaðar í 6. kap. í hesum uppskoti.

Sum fyrr nevnt ber tann kumulativa skipanin við sær, at ikki er neyðugt at meta um lønarinntøku fyri eitt komandi inntøkuár fyri at rokna út fyribilsskatt. Men tá uppskotið inniheldur nakrar frádráttir, sum eitt met skal gerast um, tá inntøkuárið byrjar (eitt nú frádrátt fyri ferðing), verður tað ofta trupult at gera av støddina á slíkum frádráttum í byrjanini av inntøkuárinum. Hjá løntakara, sum t.d. eisini er partreiðari, verður tað í mongum førum trupult at meta um, annaðhvørt hann skal rokna við vinningi ella halli. Frádráttir fyri privata rentu kunnu møguliga í onkrum føri geva trupulleikar, eitt nú um maður hevur byggilán, sum upphæddin á ikki kann gerast av, fyrr enn inntøkuárið er lokið. Her kundi ein hugsað sær tann møguleika, at t.d. lánistovnarnir eina ferð um fjórðings- ella hálvárið eftir serstakari avtalu millum skattgjaldara og skattavald kunnu senda skattavaldinum eitt yvirlit yvir ta rentu, sum tá var fallin til gjaldingar. Hetta hevði ið hvussu er minkað um munin millum fyribils goldna skattin og endaliga skattin, tá endaliga líkningin verður gjørd.

*Uppgáva arbeiðsgevarans*

Eftir núverandi reglum er tað bert í serligum førum, at ein arbeiðsgevari skal krevja inn skatt. Hetta er, tá ein skattgjaldari ikki hevur goldið rættstundis, so kann, áðrenn panting verður gjørd, krav verða lagt til arbeiðsgevaran um at halda eftir í lønini hjá løntakara upp til 50%. Eftir tí uppkrevjingarhátti, sum verður uppskotin í hesi lóg, fær arbeiðsgevarin stórt sæð ikki aðrar uppgávur, enn hann hevur havt, uttan tað, at nú verður álagt honum at gjalda skattin hjá løntakara um eitt av landsstýrinum góðkent avrokningarstað, sum nevnt er frammanundan. Annars verður her víst til viðmerkingarnar í 6. kap. Ein liður í hesi skipan er, at ein skrá yvir øll, sum gjalda út løn v.m., má verða gjørd, og fyri at henda skrá kann verða umsitin, skal arbeiðsgevarin lata upplýsingar um navn, vinnugrein, bústað v.m. 12. kap. í lógini gevur eisini reglur um, at arbeiðsgevarin skal lata inn lønarseðlar yvir útgoldnar og góðskrivaðar lønir, samsýningar v.m. í seinasta lagi 31. januar á hvørjum ári. Her er eingin munandi broyting hend í mun til núverandi lóg. Her kann eisini

verða nevnt, at um arbeiðsgevari letur vera við at avrokna A-skatt, ber hann ábyrgdina fyri tí almenna av, at skatturin verður goldin, harafturat kann hann eisini koma undir sekt. Sama ábyrgd er eisini løgd á ein løntakara, um hann tekur ímóti løn v.m., sum hann veit um, at skattur ikki er avroknaður av. Honum verður tá álagt at gjalda skattin til tað almenna beinanveg, og eisini kann hann koma undir sekt.

Í uppskotinum er eisini mælt til, at eitt eftirlit verður skipað, sum bæði skal ráðgeva arbeiðsgevarum um, hvussu avrokning av A-inntøku fer fram, og hava eftirlit við, at rætt verður atborið, tá løn v.m. skal avroknast av arbeiðsgevara.

*Fyrisitingin av skattaskipanini*

Endaliga álíkningin, tá inntøkuárið er lokið, verður í høvuðsheitunum sum nú, men álíkningin av løntakarum í nýggju skipanini verður rættiliga avmarkað, tá sum fyrr nevnt skattavaldið kennir flestar upplýsingar um persónar, sum bert hava A-inntøku. A-líkningin av teimum, sum hava B-inntøku, verður ikki stórvegis broytt frá teirri skipan, vit kenna í dag.

Uppkrevjingarskipanin, sum vit hava undir núverandi lóggávu, fær harafturímóti munandi minni arbeiðsuppgávur. T.d. verður nú ikki neyðugt at senda krøv til arbeiðsgevara um at halda eftir skatt í løn v.m. Panting av skatti verður eisini munandi minni, tá stórt sæð bert eftirstøður av B-skatti verða pantaðar. Tann núverandi rættiliga umfatandi praksis um eftirgeving av skatti og útseting av gjaldingum ella at gera gjaldskipanir við skattgjaldarar verður munandi minni, eins og skattaváttanin fellur burtur.

Samanumtikið kann verða sagt, at bæði tann broyting, sum fer at henda við sjálvari álíkningini og uppkrevjingini, hevur við sær eina umskipan og í ein vissan mun eina útbygging (flytan av starvsfólki) av teirri núverandi skattafyrisitingini. Hvat kommununum viðvíkur, so eru tað bert tær tvær størstu, sum hava eina skattliga fyrisiting, meðan flestar av hinum, og serliga tær smáu, als eingi fyrisitingarlig hjálparfólk hava, sum kunnu átaka sær tær uppgávur, sum ein slík samtíðarskattaskipan fer at áleggja teimum, um hon skal virka eftir ætlan.

Her verður tí skotið upp, samsvarandi samtykt gjørdari av løgtinginum, at skipa fyri fyrisitingarligum eindum úti um landið, sum fyri tað fyrsta kunnu taka sær av teimum meira sentralu uppgávunum sum fyribilsskrásetingini av skattaborgarunum og broyting av slíkum

gjøgnum árið. Harafturat skal ein slík fyrisiting eisini taka sær av tí fyrr nevnda arbeiðsgevaraeftirliti, bæði sum ráðgevandi og eftiransandi liði. Umframt hesar uppgávur skulu hesar fyrisitingarligu eindirnar verða til hjálpar hjá kommununum við endaligu álíkningini og annars í øllum spurningum, sum hava við skattafyrisitingina at gera. Í uppskotinum verður mælt til, at landskassin skipar fyri fyrisitingini og ber allar útreiðslurnar av henni. Hetta átti ikki at havt við sær, at talið á starvsfólki øktist, tá fleiri av teimum starvsfólkum, sum nú verða loyst frá uppgávum, sum henda broytta skattaskipan ger óneyðugar, serliga í uppkrevjingini, aftan á eina umskúling fáa tilboð um nýggj starvsøki.

*Spurningurin um fíggjarætlan hjá løgtinginum og kommununum*

Bæði skattaprosentini fyri lands-, kommunu- og kirkjuskattin skulu vera sett, áðrenn tað tíðarskeiðið byrjar, tá ið fyribilsskattur skal gjaldast. Fyribils B-skattarokningin fyri eitt inntøkuár skal sendast skattgjaldaranum innan 1. januar; tí er í lógaruppskotinum mælt til, at nevndu prosent verða ásett í seinasta lagi 1. oktober sum galdandi fyri eftirfylgjandi inntøkuár. Av fyrisitingarligum orsøkum skal skattaprosentið verða hitt sama fyri alt inntøkuárið. T.e. um ein persónur flytur millum kommunur í inntøkuárinum, verður kommunuskattaprosentið ikki broytt, men bert avrokningin millum kommunurnar. Fyri B-skattin vildi hetta annars havt við sær, at nýggj skattarokning skuldi verið send út, ella hevði munurin millum fyribils- og endaligan skatt verið ov stórur, um goldið skuldi verið eftir fyrstu skattarokningini, og kommunuskattaprosentini samstundis skuldu verið broytt í árinum.

Tá fíggjarárið bæði hjá løgtinginum og hjá kommunum er frá 1. apríl til 31. mars, má ein av treytunum fyri einari samtíðarskattaskipan vera, at bæði fíggjarætlanin hjá løgtinginum og ikki minst hjá kommununum verður lagað til nýggju skipanina. Eftir núverandi skipan verða skattaprosentini hjá kommununum ásett umleið 1. apríl, tá ið tær kenna inntøkugrundarlagið rættiliga neyvt. Eftir hesum uppskotinum krevst, at hesi prosent verða ásett í seinasta lagi 1. oktober innan fyribilsskattaárið við tí úrsliti, at fíggjarætlanin hjá kommunum nú verður tøgd út frá heilt øðrum grundarlagi enn fyrr. Hetta hevur við sær, at tey skattaprosent, sum nú verða ásett, skulu verða nýtt til eitt inntøkugrundarlag, sum kommunurnar bert kunnu meta um fer at galda í framtíðini. Fyri løgtingsfíggjarlógina er tað sama galdandi. Tað kann tí ikki verða sæð

burtur frá, at fleiri kommunur kunnu koma í stórar trupulleikar av ikki at kenna inntøkugrundarlagið, áðrenn skattaprosentið verður ásett.

Til seinast skal verða nevnt, at um henda lógin verður samtykt at galda frá 1. januar, so skal eisini samtykkjast ein lóg um eina yvirgangsskipan frá núgaldandi til ta, sum her er skotin upp, men sjálvandi kann ein slík lóg um eina møguliga yvirgangsskipan ikki leggjast fyri tingið, fyrr enn løgtingið hevur samtykt tær broytingar, sum eru uppskotnar í hesi lóg.

## Viðmerkingar til tey einstøku kapitlini

### 1. kapittul

Í hesum kapitli verða teir persónar, tey feløg v.m. og deyðsbúgv nevnd, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum. Persónar, feløg v.m. og deyðsbúgv, sum eru skattskyldug her í landinum, kunnu antin vera fult skattskyldig her, t.e. av allari inntøkuni, annaðhvørt hon hevur sín uppruna í Føroyum ella úr útlondum, ella tey kunnu vera avmarkað skattskyldug, t.e. skattskyldug av inntøkum av serligum slag jvm. 2. gr. í lógaruppskotinum.

Tá skatturin eftir uppskotinum skal útroknast og krevjast upp samstundis, sum inntøkan verður vunnin, má hetta hava ymiskar broytingar við sær í núverandi reglunum um skattskyldu, serstakliga í reglunum um, nær skattskyldan tekur við og heldur uppat. Eftir núgaldandi reglum tekur full skattskylda við, tá ein persónur hevur verið her á landi í 90 dagar, og hon heldur ikki uppat, fyrr enn ein persónur hevur verið uttanlands í minst 12 mánaðir og samstundis verið skattskyldugur sum búsettur har.

Undir eini skipan við samtíðarskatti eigur tað at vera soleiðis, at beinanveg ein persónur hevur sett búgv í Føroyum, verður samtíðarskattur kravdur frá honum av teirri inntøku, sum hann vinnur, frá sama degi, hann kemur. Tí má skattskyldan taka við, beinanveg ein persónur setur búgv her (jvm. 1. gr. nr. 1), og hon má halda uppat, samstundis sum ein hending ber við sær, at hon heldur uppat, t.d. at persónurin flytur úr Føroyum. Annars má skattskyldan sum higartil grundast á eitthvørt samband við Føroyar. Fyri fult skattskyldugar persónar má hetta sum higartil verða bústaður her ella grundast á, at hann hevur búð eina ávísa tíð í Føroyum.

*1. gr. nr. 1.* Tá avgerast skal, um ein persónur lýkur treytina fyri føstum bústaði í Føroyum, verður dentur lagdur á, um viðkomandi hevur stovnað húski, leigað sær bústað ella á annan hátt hevur víst, at tað er hansara ætlan at verða verandi her. Um nú ein persónur, sum hevur búð uttan fyri Føroyar, keypir hús í Føroyum ella leigar sær íbúð her eina ávísa tíð ella uttan serliga tíðaravmarking og flytur inn møguliga við húsfólki, samstundis sum tað møguliga verður upplýst, at hann hevur selt hús síni ella sagt upp íbúðina uttan fyri Føroyar, so er eingin ivi um, at fulla skattskyldan tekur við, beinanveg hann tekur bústað í Føroyum. Bert tað at keypa ella á annan hátt at útvega sær ein bústað í Føroyum, men ikki sjálvur at seta búgv her, er ikki nóg mikið til at stovna fulla skattskyldu í Føroyum. Treytin er, at viðkomandi eisini setur búgv her (jvm. 7. gr. 1. stk.).

*1. gr. nr. 2.* Í hesi grein snýr spurningurin seg um, nær skattskyldan hjá einum í Føroyum skattskyldugum persóni heldur uppat, tá persónurin setir búgv uttan fyri Føroyar. Hesin spurningur kann í praksis geva fleiri trupulleikar, tí ikki er altíð lætt at finna út av, um ein persónur lýkur treytirnar í hesi grein. Í eini samtíðarskattaskipan er tað av týdningi at fáa avgjørt nágreiniliga, nær skattskyldan heldur uppat fyri persónar, sum varðveita bústað í Føroyum, men sum seta búgv uttan fyri Føroyar.

Reglan sigur her, at skattskyldan heldur uppat í Føroyum frá tí degi, at ein persónur sambært sýndum skjølum kann prógva, at hann eigur at svara inntøkuskatt uttan fyri Føroyar sum búsettur har. Um hann ikki kann prógva, at hann er settur í skatt uttan fyri Føroyar, so fellur skattskyldan undir øllum umstøðum burtur í Føroyum frá tí degi, hann hevur verið burtur úr Føroyum í 4 ár, men ikki við afturvirkandi kraft frá tí degi, hann av fyrstan tíð fór heimanifrá. Hann, sum metir seg at koma undir hesa reglu, má kunna prógva, at hann lýkur treytirnar, og skattskyldan í Føroyum heldur tá uppat, frá tí degi hann lýkur hesar treytir.

Váttan frá myndugleikum uttan fyri Føroyar um, at ein persónur er settur í skatt har, kann vanliga metast sum nóg gott prógv fyri at sleppa fullu skattskylduni í Føroyum.

Upp í umtalaða 4 ára skeiðið kann eisini verða talt stutt tilhald í Føroyum, sum feria o.t., men hevur tilhaldið í Føroyum ikki verið av tílíkum slag, verður mett, at búsetingin uttanlands er hildin uppat. Tá so viðkomandi aftur setir búgv uttan fyri Føroyar, byrjar 4 ára skeiðið nú frá hesum degi. Eingin tíðarfreist er sett fyri, hvussu

leingi ein feria skal vara. Orsøkin til hetta er, at út um eina vanliga feriutíð kann verða orsøk til at taka hædd fyri, at aðrar óvæntaðar umstøður kunnu gera seg galdandi.

Ein onnur treyt fyri at nýta hesa reglu er, at bústaðurin frammanundan í Føroyum hevur verið í eitt samanhangandi tíðarskeið upp á 4 ár (jvm. 7. gr., 2. stk.) Heldur ikki er henda regla galdandi, um skattskyldan her í landinum bert er grundað á, at ein persónur hevur verið búsettur her í stutta tíð (jvm. 1. gr., nr. 4). Um slíkur persónur flytur úr Føroyum, heldur fulla skattskyldan í Føroyum uppat, tann dagin hann flytur. Við øðrum orðum kann 1. gr., nr. 2, ikki nýtast fyri persónum, sum t.d. innan fyri eitt 8 ára tíðarskeið hava verið búsettir her fleiri ferðir, sjálvt um samanlagda tíðarskeiðið er 4 ár ella meira. Treytin er, at tíðarskeiðið beint fyri fráflytingina skal hava verið samanhangandi í minsta lagi í 4 ár.

Tá fult skattskyldugur persónur í Føroyum hevur sett búgv uttan fyri Føroyar og kemur undir fulla skattskyldu sum búsettur her, er tað rímiligt, at fulla skattskyldan í Føroyum heldur uppat frá sama degi, sum hon tekur við uttan fyri Føroyar. Soleiðis sum greinin er orðað, er treytin fyri, at skattskyldan heldur uppat í Føroyum, at tað snýr seg um vanligan inntøkuskatt til fremmanda landið, sum fevnir um alla inntøkuna hjá viðkomandi (globalindkomsten). Avmarkað skattskylda til viðkomandi land, ella at skattaskipanin t.d. er so, at allir íbúgvarnir í viðkomandi landi bert gjalda eitt avgjald um árið uttan mun til inntøkuupphæddina, er ikki nóg mikið til at sleppa fullu skattskylduni í Føroyum. Um skattskyldu hjá persónum, sum útvega sær bústað her uttan at seta búgv her, verður víst til viðmerkingarnar til 7. gr., 1. stk.

*1. gr., nr. 3.* Viðvíkjandi tilhaldi í Grønlandi verður her gjørt undantak frá regluni í nr. 2. Her krevst, at tilhaldið skal vera uttan íslit í minst 2 ár og bert brotið við styttri ferium í Føroyum fyri at sleppa undan fullari skattskyldu í Føroyum, sjálvt um viðkomandi er komin undir fulla skattskyldu í Grønlandi. Heldur ikki kann ein giftur maður, sum hevur húski sítt eftir í Føroyum, sjálvt um hann hevur verið minst 2 ár í Grønlandi, sleppa undan skattskyldu í Føroyum. Um konan og møguliga børn, aftaná at hava verið í minsta lagi 2 ár í Grønlandi saman við manninum flyta aftur til Føroya, so verður maðurin aftur fult skattskyldigur í Føroyum. Við øðrum orðum, so skal ein giftur maður hava alt húski sítt í Grønlandi, eisini aftaná at tey 2 árini eru farin, fyri at kunna sleppa undan skatt-

skylduni í Føroyum. Innheintingarvaldið kann veita freist við gjaldingini av skattinum, har tað kann væntast, at tilhaldið fer at vara meira enn 2 ár.

*1. gr., nr. 4.* Sambært núgaidandi lóg er tann reglan galdandi, at um ein persónur dvølur í bráðfeingi í Føroyum, og hetta fer upp um 90 dagar innan fyri eitt 12 mánaða skeið, verður hann fult skattskyldugur frá fyrsta degi, hann kom til Føroya. Í hesum uppskoti verður mælt til, at persónar koma undir fulla skattskyldu, um teir uttan at hava bústað her dvølja her í bráðfeingi í minsta lagi 180 dagar í eitt 12 mánaða skeið. Sum tað sæst av 8. gr. og viðmerkingunum til hennara, verður eisini mælt til, at fulla skattskyldan tekur við frá tí degi, hann av fyrstan tíð kom til Føroya. Tað verður við øðrum orðum eitt bráðfeingis tilhald, sum er dupult so langt sum eftir núverandi skipan, men eftir 2. gr. í uppskotinum eru persónar, sum eru her styttri tíð enn 6 mánaðir, avmarkað skattskyldugir av allari lønarinntøku o.t., sum er vunnin í Føroyum. Hartil kemur, at skattskyldan aftan á bráðfeingis tilhald í minst 180 dagar eisini kann taka við í árinum og afturvirkandi til fyrsta dagin, viðkomandi kom.

Her kann eisini vera vert at vísa á, at Danmark, Grønland, Noreg og Svørîki eisini nýta eina bráðfeingis dvøl upp á í minsta lagi 180 dagar, áðrenn full skattskylda tekur við.

Í teimum førum, har tað ikki við byrjan av flytingini til Føroya kann verða avgjørt, um eitt styttri tilhald fer at vara meira enn 180 dagar, verður skattur fyribils eftirhildin hjá slíkum persónum eftir reglunum fyri avmarkaða skattskyldu. Avmarkað skattskylda av allari A-inntøku tekur við frá fyrsta degi, hon verður útgoldin, og tí skal A-skattur avroknast í allari inntøkuni hjá slíkum persónum. Um nú ein styttri steðgur fer út um 180 dagar, tekur fulla skattskyldan við frá fyrsta degi, viðkomandi kom higar til lands. Avmarkaða skattskyldan verður avloyst av fullari skattskyldu, soleiðis at tann avroknaði skatturin, sum er afturhildin, verður mettur sum fyribilsskattur, sum so seinni verður mótroknaður í tí endaliga skattinum, tá endaliga álíkningin sum fult skattskyldugur verður gjørd.

*1. gr., nr. 5.* Eftir hesi grein eru allir persónar umborð á føroyskum skipum skattskyldugir í Føroyum, um teir, áðrenn teir fóru umborð, vóru skattskyldugir eftir reglunum í 1. gr., nr. 1-4.

*1. gr., nr. 6.* Henda regla líkist teirri regluni, vit hava í nr. 4. Avmarkaða skattskyldan her í 180 dagar verður avloyst av fullari skatt-

skyldu, um uppihaldið umborð fer út um teir 180 dagarnar. Mannagongdin við at avrokna og eftirhalda A-skatt í A-inntøku er tann sama sum fyri persónar, sum koma undir nr. 4. Hesin fyribilsskattur verður so seinni mótroknaður í tí endaliga skattinum, tá endaliga álíkningin sum fult skattskyldugur verður gjørd.

Í hesi reglu er tó gjørt eitt týðandi undantak um, at tá ein persónur við sýndum skjølum kann prógva, at hann er settur í inntøkuskatt uttan fyri Føroyar eftir reglum, sum galda fyri búsett har, so fellur skattskyldan í Føroyum burtur, frá tí degi hann er settur í inntøkuskatt uttan fyri Føroyar. Hvat spurninginum viðvíkur um at góðtaka skattaskipanina í einum landi ella ikki, verður víst til viðmerkingarnar í nr. 2.

Arbeiðsgevari ella lønútgjaldari skal tó ávísa lønina gjøgnum eftirhaldsskipanina, so leingi ein persónur ikki kemur við váttan frá føroyskum skattavaldi um, at teir hava góðtikið, at hesin ikki er skattskyldugur í Føroyum. Viðkomandi kann, um hann lýkur treytirnar fyri skattskyldu uttan fyri Føroyar, fáa ein møguligan skatt endurgoldnan.

Í slíkum føri verður tó helst heldur torført at nýta eftirhaldsskipanina, tá hugsað verður um, at her er talan um persónar, sum koma umborð á føroysk skip í útlendskari havn og fara av skipinum aftur møguliga uttan nakrantíð at hava sett fótin á land í Føroyum.

Mælt verður tí til, at landsstýrinum verður heimilað at gera reglur um eina serstaka eftirhaldsskipan, ið skal nýtast í førum sum hesum.

*1. gr., nr. 7.* Full skattskylda umfatar eisini deyðsbúgv, sum verða tikin til skiftisviðgerð í Føroyum. Deyðsbúgv gjalda tó ikki fyribilsskatt í inntøkuárinum. Annars verður víst til viðmerkingarnar til 11, 13 og 14. gr. í lógaruppskotinum.

*1. gr., nr. 8.* Avgerandi fyri skattskylduna er her, um partafelagið er skrásett í føroysku partafelagsskrásetingini.

»Onnur vinnufeløg«. Her er skattskyldan treytað av, at ikki allir felagsmenn ábyrgjast persónliga fyri skuldbindingar felagsins, og at avlopið verður býtt í lutfalli við tann pening, sum felagsmenninir hava lagt í felagið.

Í samløgufeløgum ábyrgist í minsta lagi ein av luttakarunum (komplementaren) persónliga fyri allar skuldbindingar felagsins. Í partreiðaríum skuldbinda allir felagsmenn seg persónliga fyri skuldir felagsins, tó bert í mun til tað, teir eiga í reiðarínum (pro rata). Hesi feløg koma tí ikki undir regluna í nr. 8.

*1. gr., nr. 9.* Tryggingarfeløg, sum yvirtaka tryggingar, uttan at tryggingartakarin hevur skyldu til at luttaka í sínámillum ábyrgd, eru skattskyldug fyri henda partin av virksemi sínum. Sínámillum tryggingarfeløg, sum umframt at hava tryggingarstarvsemi eisini hava inntøku av fastogn o.t., eru skattskyldug av hesum partinum av virksemi sínum.

Í nr. 10 eru ongar broytingar gjørdar í mun til galdandi lóg.

*1. gr., nr. 11.* Í núverandi lóg er eingin regla, sum beinleiðis sigur, at keypsamtøkur eru skattskyldugar. Skotið verður tí upp í hesum uppskoti, at tær nú koma undir skattskyldu. Treytin fyri skattskylduni er, at tað snýr seg um feløg, sum hava sum endamál at keypa, útvega ella framleiða limunum í felag vørur og tænastur til eginnýtslu og burtursæð frá vanligari rentu av innskotspeningi limanna býta eitt møguligt avlop til limirnar í mun til, hvussu nógv teir hava keypt frá felagnum av vørum og tænastum. Tað er eingin treyt fyri skattskylduni, at býtið av avlopinum verður gjørt í mun til søluna í einum ári. Avgerandi er bert, at býtið av avlopinum verður gjørt í mun til søluna. Um sølan í tí einstaka roknskaparárinum verður løgd til grund undir býtinum, ella býtið verður gjørt við grundarlag í søluni í fleiri roknskaparárum, hevur ongan týdning.

*1. gr., nr. 12.* Framleiðslu- og sølufeløg eru eisini tikin við undir skattskylduna. Á sama hátt sum fyri keypsamtøkur er tað ikki spurningurin, um limirnir skuldbinda persónliga fyri skyldur felagsins ella ikki, sum er avgerandi fyri skattskylduna, men harafturímóti er tað avgerandi, at felagið hevur sum endamál at hagreiða, virðisøkja ella selja framleiðslu limanna og burtursæð frá vanligari rentu av innskoti limanna býtir eitt yvirskot í mun til, hvat limirnir hava latið til felagið. Um tað eru viðurskiftini í tí einstaka roknskaparárinum ella ikki, sum verða løgd til grund fyri býtinum, hevur ongan týdning.

*1. gr., nr. 13.* Fyri keypfeløg eru somu reglur galdandi sum fyri keypsamtøkur, men her eru tað feløg, sum keypa rávørur inn til limirnar, sum teir nýta í vinnuvirki sínum. Maskinur og tílík rakstrargøgn koma ikki inn undir heitið rávørur í hesum sambandi.

*1. gr., nr. 14.* Skattskyldan er her treytað av, at hesir felagsskapir v.m. hava inntøku av vinnuligum virksemi, og skulu teir bert gjalda skatt av inntøkuni av hesum virksemi. Sum vinnuliga inntøku

verður her hugsað um inntøku av øllum slag av vinnuligum virksemi, eitt nú rakstur ella burturleigu av fastogn v.m. Avlop, sum hesi feløg hava av at lata vørur til limir sínar, verður ikki mett sum vinnulig inntøka. Aðrar ikki vinnuligar inntøkur, sum kunnu nevnast, er studningur frá almennum myndugleikum, gávur og limagjøld. Harafturímóti má alment atgongugjald o.t. metast sum vinnuligar inntøkur.

*Avmarkað skattskylda*

*2. gr.* Henda grein inniheldur reglur um avmarkaða skattskyldu fyri persónar, feløg v.m., sum ikki koma undir reglurnar í 1. gr., og fyri deyðsbúgv, sum verða tikin til skiftisviðgerð uttan fyri Føroyar. Í hesum uppskoti til løgtingslóg eru gjørdar munandi broytingar í teirri avmarkaðu skattskylduni í mun til galdandi reglur, har allari lønarinntøku vunnin undir einum bráðfeingis tilhaldi í Føroyum (undir 90 dagar) varð álagt eitt fast avgjald upp á 40%. Fór bráðfeingis tilhaldið upp um 90 dagar, so varð roknað við fullari skattskyldu. Her verður skotið upp, at avmarkað skattskylda kann vara í upp til 180 dagar, jvm. her 1. gr., nr. 4. Harafturat kemur, at nú verður eisini mælt til, at avmarkað skattskyldug verða skattað við somu prosentum, sum eru galdandi fyri fult skattskyldug. Avmarkað skattskylda eftir 2. gr. tekur við sambært 6. gr., 1. stk., tá treytin fyri skattskyldu er uppfylt, t.e. frá tí degi viðkomandi fær løn, sum stavar frá virksemi her á landi. Í 2. gr. a) verður sligið fast, at allar inntøkur vunnar her í landinum av slíkum slag, sum rætt er um í 60. gr., 1. stk. nr. 1, og sum stava frá virksemi her á landi, verða gjørdar avmarkað skattskyldugar. Um ein arbeiðsgevari við heimstað í Føroyum letur løn v.m. fyri arbeiði gjørt uttan fyri Føroyar, er móttakarin ikki skattskyldugur av teimum, uttan so at hann er fult skattskyldugur í Føroyum.

Í 1. stk. b) er galdandi, at um ein hevur inntøkur her í landinum av slíkum slag, sum rætt er um í 60. gr., 1. stk. nr. 2-7, og 60. gr., 2. stk., so er hann avmarkað skattskyldugur í Føroyum. T.e., at allar inntøkur av slíkum slag, har skattur skal haldast eftir, og eisini slíkar, sum eftir nærri reglum frá líkningarráðnum verða roknaðar sum A-inntøkur, eru skattskyldugar hjá móttakaranum, sjálvt um hann ikki er fult

skattskyldugur í Føroyum. Her er einasta treytin fyri avmarkaða skattskyldu, at ein hevur inntøku úr Føroyum. Tað hevur soleiðis ongan týdning, um tær í 60. gr., nr. 7 nevndu samsýningar v.m. eru vunnar sum nevndarlimur fyri virksemi uttan fyri Føroyar ella í Føroyum. Heldur ikki fyri tær í 60. gr., nr. 4 nevndu pensiónir v.m. hevur tað nakran týdning, um fyrrverandi tænastan er gjørd uttanlands ella her heima.

Sum nevnt er ein treyt fyri skattskylduni eftir 1. stk. a) og b), at viðkomandi hevur inntøku her í landinum. Hetta má tó skiljast samsvarandi reglunum í 61. gr. 1. stk. b), jvm. 66 gr., soleiðis, at skattskyldan ikki er til, tá útgjaldingin av inntøkuni verður gjørd av persónum, deyðsbúgvum, feløgum v.m., sum ikki hava heimating í Føroyum. Heimating í Føroyum hava persónar, sum hava bústað her, og felagsskapir og feløg v.m., tá høvuðsskrivstova v.m. liggur í Føroyum. Partafeløg, sum eru skrásett í Føroyum, hava heimating her. Snýr tað seg um útlendsk partafeløg, so er spurningurin, um deildarskrivstovan liggur í Føroyum ella ikki, jvm. her 66. gr.

Avmarkað skattskylda sambært 1. stk. a) og b) er bert galdandi fyri inntøkuna, men ikki fyri ognina, og útreiðslur kunnu bert dragast frá, í tann mun tær hava samband við hesa inntøku, jvm. 2. stk.

*2. gr., 1. stk. c).* Her verður avgjørt, at royalties kemur undir avmarkaða skattskyldu í Føroyum. Sum royalty undir hesum stk. kemur royalty yvirhøvur, t.d. av rakstrinum av námi ella øðrum natúrevni, og skal tað skattast í tí kommunu, har tað liggur. Annað royalty kann vera aftur fyri nýtslurættin ella einarættin yvirhøvur av rithøvunda- og forlagsrætti, patent, tekning, loynilig framleiðslulag og recept, vørumerki el.t. Tá størsti parturin av hesum fellur til persónar, sum eru skattskyldugir í Danmark, kemur henda reglan sambært dupultskattaavtaluni við Danmark at hava minni týdning sum skattakelda í Føroyum. Í lógaruppskoti, sum seinni verður framlagt, verður ætlandi eitt endaligt avgjald upp á 25% roknað av royalty.

*2. gr., 1. stk. d), e) og f)* eru ikki broyttar í mun til núverandi lóg, uttan at í f) er forpagtningsavgjald eisini tikið við undir avmarkaða skattskyldu. Heldur ikki er hend nøkur broyting í 2. og 3. stk. í mun til núverandi lóggávu.

*Undantikin skattskyldu*

*3. gr.* Einasta broyting, ið her er hend í mun til núverandi lóg, er, at reglan í 16. gr., 1. stk. g) í lógini frá 1963 ikki er tikin við í hesum uppskoti. Her var talan um, at lutafeløg við óavmarkaðari ábyrgd limanna, og sum bert skiftu við limir sínar, ikki komu undir skattskyldu. Í hesum uppskoti eru beinleiðis tey lutafeløg tilskilað, sum eru skattskyldug, samstundis sum ikki longur verður kravt, at tey lutafeløg, sum bert handla við limir sínar, skulu hava óavmarkaða ábyrgd, jvm. 1. gr., nr. 14. Harafturat kemur, at 2. stk. gevur landsstýrinum rættiliga stórar møguleikar at gera undantøk frá skattskylduni.

*Skatting av hjúnum*

*4. gr.* Her er ikki gjørd nøkur broyting í teimum núverandi reglunum uttan í 1. stk., har sagt verður, at treytin fyri samskatting av hjúnum er, at bæði eru skattskyldug í Føroyum eftir 1. gr. Viðmerkingarnar, sum vóru gjørdar, tá hesar reglur vóru samtyktar í løgtinginum í 1978, eru tí eisini galdandi her.

*Skatting av børnum*

Sambært 5. gr., 1. stk. eru børn, uttan mun til aldur, altíð sjálvstøðug skattskyldug og eisini uttan mun til, um tey búgva heima ella ikki. Við øðrum orðum, so skal eitt barn, sum er fult ella avmarkað skattskyldugt, lata inn sjálvuppgávu og setast í skatt sum aðrir skattgjaldarar. Av praktiskum orsøkum verður tann higartil nýtti praksis varðveittur, at børn, sum ikki hava fylt 16 ár, bert skulu lata inn sjálvuppgávu og takast við í skattsetingini, um tey í inntøkuárinum hava havt inntøku ella hava ogn, sum gevur teimum skattskylduga inntøku. Um eitt barn við byrjanina av inntøkuárinum hevur fylt 16 ár, skal tað altíð lata inn sjálvuppgávu.

Sum nýtt 2. stk. er gjørd ein regla um, at foreldur, stjúk- ella fosturforeldur, sum reka sjálvstøðuga vinnu, ikki kunnu draga útreiðslur til løn til børn undir 16 ár frá í skattskyldugu inntøku síni. Lønin skal heldur ikki takast við í skattskyldugu inntøkuna hjá barninum. Er barnið harafturímóti 16 ár við byrjanina av inntøkuárinum, so skal lønin takast við í skattskyldugu inntøkuni hjá tí og kann dragast frá inntøkuni hjá foreldrum v.m.

*5. gr., 1. stk.* Her verður sagt, at snýr tað seg um uppihaldspening

av ymiskum slag til børn, er hann altíð skattskyldugur hjá børnunum. Verður hesin peningur latin av foreldrum, er treytin, at hann er álagdur av myndugleikunum. Í sambandi við hjúnabandsslit kann upphæddin verða avgjørd við lóggildari avtalu, sum so má verða nýtt sum grundarlag undir skattingini av bæði børnunum og foreldrunum. Um upphæddin fer upp um upphæddina fyri forsyrgjaraskylduna, so má hon viðgerast sambært 4. stk. ella sum ein gáva, sum ikki kann dragast frá hjá gevara. Sambært 33. gr., nr. 9, kunnu vanliga slíkar upphæddir dragast frá hjá tí, sum letur tær. Treytin fyri frádrátti er tó, at barnið ikki býr saman við tí, sum letur slíka upphædd. Frádrátturin er bert loyvdur, til barnið hevur fylt 18 ár, men tó kann í serligum umstøðum ein upphædd verða áløgd uppihaldsskylduga, aftaná at barnið hevur fylt 18 ár, t.d. til útbúgving v.m. Í slíkum førum skal barnið ikki taka upphæddina við sum skattskylduga inntøku, tá hetta ikki kann dragast frá hjá uppihaldsskylduga.

Fyri børn, sum eru í pleygu, og sum støðugt gjald verður latið fyri, er tann reglan galdandi, at upphæddin ikki skal takast við í inntøkuni hjá barninum, men skal roknast við í inntøkuni hjá pleyguforeldrunum, sum so kunnu draga frá útreiðslurnar fyri at hava barnið í pleygu, tó ongantíð meira enn tann upphæddin, sum fingin er fyri tað. Fáa pleyguforeldrini harafturímóti eisini uppihaldspening fyri barnið, skal henda upphædd takast við í skattskyldugu inntøkuni hjá barninum.

*5. gr., 3. stk.* Her verður viðgjørt tað uppihald, sum børn fáa frá foreldrum heima, og sum ikki er løn fyri nakað arbeiði. Slíkt uppihald er ikki skattskyldugt og kann heldur ikki dragast fra hjá foreldrunum.

*5. gr., 4. stk.* Her snýr spurningurin seg um, at eitt barn hevur fingið eina innløguveiting ella ogn sum gávu frá foreldrum, stjúk- ella fosturforeldrum. Herundir kemur eisini forskot upp á arv. Inntøka, sum slík innløguveiting, ella inntøka, sum slík ogn gevur av sær, verður tikin við í skattskyldugu inntøkuni hjá gevara og ikki hjá barninum. Treytin er tó, at gevarin er fult skattskyldugur her í landinum, og um hetta ikki er so, skal barnið taka inntøkuna við í sína skattskyldugu inntøku, um tað er skattskyldugt her. Hetta er tó bert galdandi til endan av tí álmanakkaári, ið barnið fyllir 18 ár ella giftist. Inntøkuárið, eftir at barnið hevur fylt 18 ár, verður inntøkan av hesum tikin við í skattskyldugu inntøku tess ella hjá møguligum hjúnafelaga, sum tað er samskattað við.

Um gávan verður givin solciðis, at foreldrini geva barninum aðra

ogn, t.d. eitt virðisbræv, skulu foreldrini, inntil barnið er 18 ár ella giftist, taka inntøkuna av hesum við í skattskyldugu inntøku sína. Um gávan verður givin soleiðis, at foreldrini átaka sær skyldu til at rinda eitt leypandi gjald, sum ikki er uppihaldspeningur, ella átaka sær eina skuldbinding fyri barninum, so kunnu foreldrini v.m. ikki draga leypandi gjaldið ella rentuna frá síni skattskyldugu inntøku. Reglan sambært hesum stk. er galdandi, bæði um barnið býr heima hjá gevara, ella tað býr aðrastaðni. Eisini er reglan galdandi, sjálvt um innløguveitingin ella ognin er latin barninum, áðrenn henda lóg kom í gildi, og tí frammanundan hevur verið skattað hjá barninum.

## Nær skattskyldan tekur við og heldur uppat

## 2. kapittul

Reglurnar í hesum kapitli hava neyvt samband við reglurnar í 1. kap. Viðmerkingarnar her koma tí ofta at vísa aftur til tær viðmerkingar, sum eru gjørdar til serliga 1. og 2. gr. í 1. kapitli.

Í 2. kap. eru reglur um, hvussu umfatandi tann skattskylda, ið nevnd er í 1. kap., er, og nær hon tekur við og heldur uppat, t.e. tað tíðarskeið, ið skattskyldan umfatar, og tí eisiui, hvønn dag hon tekur við, og hvønn dag hon heldur uppat. Tá ein lýkur treytirnar fyri skattskyldu sambært 1. kap., hevur hetta við sær, at frá sama degi skal skattur gjaldast av teirri inntøku, sum verður vunnin frá hesum degi, og líka til tann dag, treytirnar fyri skattskyldu falla burtur.

Í 6. gr. verður bert sligið fast, at ein verður settur í inntøkuskatt, so leingi ein lýkur treytirnar fyri skattskyldu sambært 1. og 2. gr. í hesum uppskoti, og at hjún verða samskattað av allari inntøku síni sambært 4. gr. 1. stk., so leingi tey lúka treytirnar fyri samskatting.

*Flyting til Føroya og úr Føroyum*

Sambært 6. gr. 1. stk., jvmt. 1. gr. 1. stk., verður persónur, ið fær sær bústað her og samstundis setur búgv her, fult skattskyldugur frá tí degi, hann fær sær bústað her.

At ein persónur fær sær bústað her á landi, hevur sum oftast við sær, at hann eisini setur búgv her. Um hann ikki setur búgv her eisini, hevur reglan í 1. gr. nr. 2 við sær, at hann sum oftast heldur ikki verður fult skattskyldugur her á landi, tí hann antin enn hevur fulla skattskyldu uttan fyri Føroyar, ella at hann hevur havt búgv har tey seinastu 4 árini.

Persónar, sum ikki hava fingið sær bústað her á landi, men hava hildið til her í minsta lagi 180 dagar í eitt 12 mánaða tíðarskeið, verða sambært 8. gr. fult skattskyldugir her á landi, frá tí at teir av fyrstan tíð fingu sær tilhald her.

Sama skattatalva verður nýtt til at rokna skattin út eftir, um inntøkan er vunnin teir fyrstu 180 dagarnar ella seinni, tá viðkomandi kemur undir fulla skattskyldu.

Flestir persónar, hetta kemur at snúgva seg um, verða helst vanligir løntakarar. Verða teir í staðin fyri avmarkað skattskyldugir teir fyrstu 180 dagarnar og so fult skattskyldugir frá 181. degi, hevði hetta havt við sær, at teir ongan persónsfrádrátt fingu fyri teir 180 dagarnar. Hetta hevði helst verið trupult at skilt hjá teimum flestu, at slíkur munur skuldi verið á skattsetingini fyri hesi bæði tíðarskeiðini, serliga um hugsað verður um ein persón, sum aftaná at hava verið her í 190 dagar ger av at verða verandi her í eitt longri tíðarskeið. Grundgevingarnar fyri at geva persónsfrádrátt aftan á 180 daga tilhald her á landi vilja í flestum førum eisini tala fyri at geva persónsfrádrátt í fyrra tíðarskeiðinum, kanska serliga tí at um full skattskylda ikki tók við her, fyrr enn 180 dagar vóru gingnir, so høvdu óivað fleiri, sum bert høvdu ætlan um at vera her eitt stutt skifti, sagt, at ætlan teirra var at vera longur enn 180 dagar, bert fyri at fáa lut í persónsfrádráttinum beinanveg við skattaútrokningina.

Ein onnur avleiðing av, at skattskyldan tekur við longu frá byrjanini av tilhaldinum, verður, at øll inntøkan frá 1. tilflytingardegi verður skattskyldug her á landi, uttan mun til um hon stavar frá Føroyum ella ikki (globalinntøkugrundreglan). Annars verður her víst til viðmerkingarnar til 1. gr. nr. 4.

Eisini skal verða nevnt, at persónar, sum bert eru avmarkað skattskyldugir sambært 2. gr., koma undir avmarkaða skattskyldu, beinanvegin teir hava inntøku av tí slag, sum umrøtt er í 2. gr. 1. stk. a)-g). Henda avmarkaða skattskyldan fellur burtur, beinanvegin sonn inntøkur falla burtur.

*Skattseting aftan á hjúnaband, og tá tað verður slitið*

Núgaldandi reglur siga, at kvinna, sum giftist í skattaárinum, er skattskyldug skattaárið út. Eisini eru reglur í núgaldandi skattalóg um, hvussu gift kvinna skal skattast, um vinnan heldur uppat stutt eftir hjúnabandið.

Í hesum uppskoti verður í staðin skotið upp, at kvinna, sum giftist í inntøkuárinum, verður skattað saman við manninum frá

byrjanini av tí inntøkuári, tey giftust í, og eisini av teimum inntøkum, ið nevndar eru í 4. gr. 2. stk., fyri alt inntøkuárið. Hetta fer at hava við sær, at tá endaligi skatturin skal álíknast í tí árinum, tey giftust, fær maðurin hennara fulla persónsfrádrátt, sum tó fyrst verður roknaður í hennara inntøkum sambært 4. gr. 2. stk. Inntøka av møguligari ogn, sum konan átti, áðrenn tey giftust, verður nú tikin við í skattskyldugu inntøkuni hjá manni hennara fyri alt inntøkuárið. Eisini fer hetta at hava við sær, at um konan, áðrenn hon giftist, rak sjálvstøðuga vinnu, sum hon nú gevst við og letur mannin taka sær av, verður maður hennara nú settur í skatt av allari inntøkuni av hesum virki í inntøkuárinum.

Eftir núverandi lóggávu verða hjún, sum verða sundurlisin ella skild, sett í skatt hvørt sær frá byrjanini av tí skattahálvári, ið kemur aftaná, at dómur varð uppsagdur ella skilnaðarloyvi givið. Hjún, sum slíta sambúð sína uttan at verða sundurlisin ella skild, verða sett í inntøkuskatt hvørt sær frá og við tí degi, skattaár byrjar, um sannað verður, at treytirnar fyri, at tey mega roknast fyri at liva skild, eru fyri hendi, nú árið byrjar.

Í hesum uppskoti verður bert tann broyting gjørd, at nú verða hjún, ið eru sundurlisin ella skild, sett í inntøkuskatt hvørt sær, frá tí at dómur varð uppsagdur ella skilnaðarloyvi givið.

Til tær einstøku greinirnar í hesum kapitli kunnu annars verða gjørdar hesar viðmerkingar.

*6. gr.* Í hesi grein hava vit høvuðsregluna í eini skipan, har skattur verður goldin, samstundis sum inntøkan verður vunnin. Henda grundregla sigur, at skattskyldan og somuleiðis samskatting av hjúnum her á landi stendur við, so leingi ein lýkur treytirnar fyri skattskyldu, ávikavist treytirnar fyri samskatting her á landi.

Næsta høvuðsreglan, sum eisini skal verða nevnd her, sigur, at tað er inntøkan í tí tíðarskeiði, skattskyldan her á landi stendur við í, sum kemur undir skatting her á landi. Hesa reglu hava vit í 24. gr. í lógaruppskotinum. Har skattskyldan ikki varir alt árið, tí hon tekur við ella heldur uppat, møguliga bæði tekur við ella heldur uppat í árinum, er tað bert inntøkan í tí partinum av árinum, skattskyldan hevur staðið við, sum kemur undir skatting (jvmt. 24. gr. 2. stk.). Inntøkan aftan á frádráttir verður upproknað, so hon svarar til inntøkuna í 12 mánaðir, og skatturin fyri hesar 12 mánaðirnar verður útroknaður, og skatturin, sum nú skal gjaldast, skal svara til tann partin av árinum, ein hevur verið skattskyldugur í.

Serskatting av giftari kvinnu av teimum inntøkum, sum nevndar eru í 4. gr. 2. stk., verður eisini bert fyri tað tíðarskeiðið, hjúnini eru samskattað.

Við øðrum orðum, so hevur henda reglan í hesi grein við sær, at skattskyldan her á landi varir so leingi, ein persónur hevur bústað her, og hon heldur ikki uppat, bert tí viðkomandi hevur ella fær sær bústað uttan fyri Føroyar og eisini har kemur undir fulla skattskyldu. Sáttmálar við onnur lond um at sleppa undan tvinnanda skatting av inntøkum kunnu hava við sær, at sjálv skattsetingin heilt ella lutvíst heldur uppat. Um skattskyldan her í landinum stendur við, og ein persónur flytur til eitt land, vit ikki hava slíkan sáttmála við, kemur hann ofta undir tvinnanda skatting, men hesin skattur verður strikaður sambært kredittregluni í 154. gr. 2. stk., tó bert skattur av inntøkum, sum stava frá keldum uttan fyri Føroyar, og sum hann er settur í skatt av her á landi.

Í hesum sambandi stingur spurningurin seg upp, nær metast kann, at ein persónur er fluttur úr Føroyum, soleiðis at vit eiga at sleppa skattskylduni her. Bert tað, at ein persónur skattskyldugur í Føroyum hevur hús standandi eftir her, aftaná at hann er fluttur av landinum, kann ikki altíð í sjálvum sær føra til, at vit halda fast við skattskylduna her á landi. Ofta kunnu vit tó sum meginreglu siga, at slíkur persónur ikki hevur slept bústaðnum her, men um nú húsið er útleigað til annan fremmandan persón, so kann tað ofta benda á, at slíkur persónur hevur latið bústaðin her á landi frá sær, soleiðis at hann ikki longur hevur slíkt samband við Føroyar, sum ger, at vit kunnu halda fast við, at hann hevur fastan bústað her.

Um nú tey, sum hava leigað húsið, kunnu sigast upp við stuttari freist (1 mánað), so hevur hetta við sær, at vit ikki meta, at hann hevur slept bústaðnum her á landi, soleiðis at skattskyldan heldur uppat. Er harafturímóti slíkt leigumál gjørt fyri longri tíð, so kunnu vit ikki siga, at húsið er tøkt sum bústaður hjá skattskylduga, og hann má tí metast at hava slept bústaðnum her við teirri avleiðing, at skattskyldan heldur uppat, um aðrar treytir annars eru uppfyltar eftir hesi lóg, jvmt. 1. gr. nr. 2.

Um ein persónur flytur úr Føroyum uttan at verða sundurlisin ella aðra ósemju við hjúnafelagan og letur húsfólk sítt verða eftir her, kunnu vit í høvuðsheitunum ikki rokna við, at bústaðurin her á landi er sleptur, og verður tí slíkur persónur fult skattskyldugur her á landi.

*7. gr.* Um ein persónur fær sær hús (íbúð) her á landi og bert nýtir tey til styttri feriutilhald uttan sjálvur at seta búgv her, so sigur 1. stk., at hann ikki verður skattskyldugur her á landi sambært 1. gr. nr. 1.

Spurningurin, sum her skal takast støða til, er, nær eitt tilhald er so stutt, møguliga eitt tilhald innan fyri eitt ávíst tíðarskeið, at tað ikki hevur skattskyldu her á landi við sær. Eitt samanhangandi tilhald her upp á minst 3 mánaðir, ella eitt samanlagt tilhald her upp á meira enn 180 dagar innan fyri eitt ár, kann ikki verða mett sum eitt styttri tilhald her, so sum feria o.t.

Reglan í 1. gr. nr. 2 um, at persónar, sum tey seinastu 4 árini hava havt bústað her, varðveita skattskylduna her, vil sambært 2. stk. ikki kunna nýtast fyri skattskyldugum, sum bert í stutta tíð hava sett búgv her á landi. Hon er bert galdandi fyri flyting úr Føroyum, tá hin skattskyldugi frammanundan hevur búð í Føroyum í eitt samfelt tíðarskeið upp á minst 4 ár. Hetta vil siga, at 1. gr. nr. 2 ikki kann verða nýtt, um t.d. ein persónur innan fyri eitt 8 ára tíðarskeið hevur havt bústað her á landi fleiri ferðir, sjálvt um samanlagda tíðarskeiðið er 4 ár ella meira. Treytin er, at tíðarskeiðið beint fyri fráflytingina skal hava verið minst 4 ár.

Dømi: Ein persónur flytur úr Føroyum og verður fult skattskyldugur uttan fyri Føroyar. Skattskyldan í Føroyum fellur burtur, frí tí hann tekur bústað uttanlands og verður settur í skatt har eftir teimum reglum, sum galda fyri aðrar skattskyldugar persónar í tilflytingarlandinum. Eitt ár seinni flytur hann til annað land, har hann ikki kemur undir fulla skattskyldu. Hann verður nú aftur fult skattskyldugur til Føroya, og stendur henda nú við, til persónurin møguliga aftur verður skattskyldugur til eitt fremmant land, ella 4 ára skeiðið er runnið.

Við øðrum orðum: Skattskyldan í Føroyum stendur við, so leingi ein persónur hevur bústað her, og hon kann standa við í eina ávísa tíð, sjálvt um persónurin hevur slept bústaðnum her á landi.

*8. gr.* Spurningurin í hesi grein, sum er umrøddur fyrr, snýr seg um, nær ein persónur, sum ikki hevur tikið bústað her á landi, men bert hevur tikið tilbald her fyri eina styttri tíð, verður skattskyldugur her. Í teimum førum, har tað ikki longu við byrjanina av tilflytingini er greitt, at hon fer at vara longur enn 180 dagar, verður fyribilsskattingin gjørd eftir reglunum um avmarkaða skattskyldu, sum so verður avloyst av fullari skattskyldu frá fyrsta degi, tilflytarin kom higar til lands, um hann verður her meira enn 180 dagar í eitt 12

mánaða tíðarskeið. Annars verður víst til viðmerkingarnar framman-fyri og serliga til 1. gr. nr. 4.

*9. gr.* Her verður tann broyting gjørd frá galdandi reglum, at ein kvinna, sum giftist í inntøkuárinum, verður samskattað við manninum frá byrjanini av sama iuntøkuári. Tó soleiðis, at hon verður sett í skatt fyri seg av teimum í 4. gr. 2. stk. nevndu inntøkum, viðroknað bæði inntøkur, hon hevur havt í inntøkuárinum, áðrenn hon giftist, og tær inntøkur, hon hevur havt í sama inntøkuári, aftaná at hon giftist.

*10. gr.* Eftir hesum uppskoti, jvmt. her 6. gr. 2. stk., heldur samskattingin av hjúnum uppat, frá tí at dómur varð uppsagdur ella skilnaðarloyvi givið. Samstundis heldur serskatting av konuni sambært 4. gr. 2. stk. uppat. Konan verður nú sett sjálvstøðugt til skatt av egnu inntøkum sínum og hjá møguligum børnum, sum hon hevur heima hjá sær, jvmt. tó 5. gr. Inntøkur sum konan hevur havt sambært 4. gr. 2. stk. fyri skilnaðin, verða eisini skattaðar hjá henni, somuleiðis eisini inntøkur av serogn og inntøkur í inntøkuárinum av tí parti av felagsbúnum, sum verður skiftur henni. Maðurin verður skattaður av øllum eftirverandi inntøkum. Bæði fáa fullan persónsfrádrátt fyri alt inntøkuárið.

Í 2. stk. hava vit ikki sama greiða rættargrundarlag at ganga út frá sum í 1. stk. Ofta er tað soleiðis, at vit fyrst aftaná, at ein tíð er gingin, kunnu gera av, um nú hjún hava slitið sambúð sína, og tala er um eitt veruligt sambúðarslit. Tað hevði havt nógvar trupulleikar við sær hjá skattavaldinum, um slík hjún skuldu verið sett í skatt fyri seg, tá tey søgdu seg hava slitið sambúð sína, tí ofta skuldi verið kannað eftir, um og nær tey nú høvdu slitið sambúð sína. Tí er reglan í galdandi lóg ikki broytt í hesum uppskoti, sum sigur, at slík hjún verða sett í inntøkuskatt hvørt sær frá og við tí degi, nýtt inntøkuár byrjar, um sannað verður, at treytirnar fyri, at tey mega roknast fyri at liva aðskilt, eru til staðar, men flyta tey saman aftur, áðrenn fyrsta inntøkuárið, ið tey eru sett í skatt hvørt sær, er at enda komið, falla hesar skattsetingar burtur.

*Deyðsbúgv*

Eftir galdandi reglum fellur skattskyldan burtur, tá persónur doyr, tá ið mánaðurin, hann er deyður, gongur út. Situr einkja eftir, skal hon

verða sett í skatt frá tí degi, næsti mánaður byrjar.

Tá vit nú hava skotið upp, at skatturin skal verða goldin av inntøkuni, so hvørt hon verður vunnin, so má henda skipan virka soleiðis, at ein persónur skal gjalda skatt av inntøkuni, til hann doyr, og má skattskyldan tá halda uppat frá sama degi, hann er deyður. Inntøkur, sum eru vunnar aftan á deyðsdagin, koma tá arvingunum til góðar, og eiga hesir tí sum meginreglu beinanveg at verða skattskyldugir av hesum inntøkum, men um ein almenn skiftisviðgerð skal verða gjørd eftir hin deyða, fáa vit her eitt sjálvstøðugt rættarsubjekt, sum fær allar inntøkurnar, meðan hetta skifti fer fram. Sum meginreglu eigur eitt slíkt búgv, sum er tikið til almenna skiftisviðgerð, at vera skattskyldugt av øllum inntøkunum frá deyðsdegnum, og til skiftisviðgerðin er endað. Skattskyldan hjá arvingunum av inntøkunum av teimum ognum, teir fáa úr búnum, tekur so ikki við, fyrr enn búgvið er skift.

Herafturat kemur, at vit eisini mega hava reglur, sum tryggja, at tær ognir, sum skulu takast við í slíka inntøkuuppgerð, verða virðismettar soleiðis, at skattsetingin verður framhaldandi (kontinuerlig).

1. gr. nr. 7 slær fast, at slík deyðsbúgv, sum eru tikin til skiftisviðgerð her á landi, eru skattskyldug her. Hetta er galdandi bæði fyri búgv, sum eru tikin til almenna og privata skiftisviðgerð.

Í 6. gr. 1. stk. verður sagt, at slík búgv, sum her eru nevnd, verða skattskyldug, so leingi treytirnar fyri skattskyldu eru uppfyltar sambært 1. gr. og 2. gr. Hetta hevur her at siga, at búgvið sjálvt er skattskyldugt, til skiftisviðgerðin er lokin, og tekur henda skattskylda við frá deyðadegi og heldur uppat, tann dagin skiftisviðgerðin endar jvmt. 15. gr.

*11. gr.* Her verður sligið fast, at skattskyldan heldur uppat á deyðadegnum, samstundis tekur skattskyldan hjá búnum eftir hin deyða við sambært 1. gr. nr. 7.

Hetta hevur at siga, at allir fyribilsskattir líka til deyðadagin skulu gjaldast. Viðvíkjandi A-skatti fer hetta ikki at geva nakrar trupulleikar, men fyri B-skattin má tað avgerandi fyri, um eitt gjald skal gjaldast, vera, um hetta er fallið til gjaldingar fyri deyðadagin ella ikki. Tá hesir skattir eru fyribilsskattir, sum eru á conto gjøld av einum endaligum skatti, sum fyrst kann roknast út við endaligari álíkning, stingur tann spurningur seg upp, um ov nógv ella ov lítið er goldið í tvey tíðarskeið.

Í fyrra lagi í inntøkuárinum fyri andlátið og í øðrum lagi í inntøkuárinum, sum andlátið var.

Um sjálvuppgáva fyri tað fyrra tíðarskeiðið ikki er latin inn fyri andlátið, skal búgvið lata inn sjálvuppgávu, og er hetta galdandi fyri bæði alment og privat skift búgv. Har hjúnafelagi situr eftir við óskiftum búgvi, er tað hesin, sum skal lata inn sjálvuppgávuna. Treytirnar fyri skatting eftir hesi sjálvuppgávu eru tær, sum eru galdandi, um tað var hin deyði, ið sjálvur læt hana inn.

*12. gr.* Henda regla verður nýtt, tá skattskyldan hjá manninum fellur burtur, tí hann doyr, ella tí hann fær sær bústað ella setur búgv uttan fyri Føroyar undir slíkum viðurskiftum, at tað er greitt, at felagsbúgv er slitið. Konan verður nú sett í skatt fyri seg, tó er tað ein treyt, at hon lýkur tær vanligu treytirnar í 1. gr. og 2. gr. um skattskyldu her í landinum.

Hjá børnum er tó treytin fyri sjálvstøðugari skattskyldu, at tey ikki, aftaná at samskatting við tann flutta persónin er hildin uppat, skulu samskattast við annan persón (í flestum førum mammuna), sum tey búgva hjá. Í øllum øðrum førum verða tey eisini fult skattskyldig, um tey lúka treytirnar í 1. gr. og 2. gr. frá tí degi, tann persónur, tey vórðu samskattað við, er fluttur.

*13. gr.* Henda grein fevnir um seinna tíðarskeiðið av teimum báðum, sum eru nevnd í viðmerkingunum til 11. gr., og tí tíðini, sum eftirsitandi hjúnafelagin situr í óskiftum búgvi.

Um hann tekur yvir felagsbúgvið og situr í óskiftum búgvi, so yvirtekur hann heilt skattskylduna hjá tí deyða, sum um tað var hansara egna, soleiðis at eftirsitandi hjúnafelagin verður skattskyldugur av øllum inntøkunum hjá tí deyða í inntøkuárinum til deyðadagin, og verða eisini teir fyribilsskattir, sum eru goldnir, góðskrivaðir eftirsitandi hjúnafelaga.

Skattingin fevnir um allar leypandi inntøkur, somuleiðis inntøkur av teimum ognum, sum hin deyði hevur átt, og sum annars eftir skattalógini eiga at verða tiknar við í skattleggjandi inntøkuna, tá tær verða seldar. Allar leypandi inntøkur verða skattaðar, samstundis sum tær verða vunnar, eftir teimum vanligu reglunum í skattalógini, meðan skatting av vinningi við sølu av ognum ikki verður gjørd, fyrr enn búgvið selur tær til triðjamann, ella tá eftirsitandi hjúnafelagi, sum situr við óskiftum búgvi, selur til triðjamann.

Tá ið eftirsitandi hjúnafelagi situr við óskiftum búgv, verur sagt, at búgvið og eftirsitandi hjúnafelagin »succederar« — kemur í staðin

fyri hin deyða. Hetta hevur í fyrra lagi at siga, at vinningur/hall skal gerast upp á sama hátt, sum hetta vildi verið gjørt, sum tað var hin deyði, sum seldi ognirnar. Í øðrum lagi hevur hetta at siga, at búgvið ella eftirsitandi hjúnafelagin skal taka yvir gjørdar avskrivingar hjá tí deyða upp á ognirnar, sum verða yvirtiknar, soleiðis at avskrivingargrundarlagið ikki broytist orsakað av andlátinum.

Hesar reglur eru eisini galdandi, tá eitt búgv uttan skiftisviðgerð eftir skiftilógini verður lagt út til eftirsitandi hjúnafelaga.

Tað, at inntøkurnar verða samanlagdar, fer við einum progressivum skattastiga at geva eftirsitandi ein ov høgan skatt, enn um bæði vóru sett í skatt fyri seg. Tí verður tann reglan galdandi her, at um ein kona hevur verið skattað fyri seg sambært 4. gr. 2. stk., fyri andlátið, skulu tvær skattsetingar verða gjørdar. — Ein skattseting, sum fevnir um inntøkuna, sum serskattað kona hevur havt, uttan mun til, hvørt av hjúnum er deytt, og ein, sum fevnir um hinar inntøkurnar fyri alt inntøkuárið. Skatturin verður útroknaður av hvørjari inntøku sær, og tann skatturin skal so gjaldast av tí eftirsitandi, sum so fær góðskrivað allan goldna fyribilsskattin hjá hjúnunum. Tá slík uppgerð er fyri eitt styttri tíðarskeið enn 12 mánaðir, skal altíð verða roknað við eini inntøku, sum er umroknað til 12 mánaðir, og skal so skatturin gjaldast fyri tað tíðarskeið av árinum, hin deyði hevur verið á lívi. Har konan ikki hevur verið sett í skatt fyri seg í tíðini fyri andlátið, verður bert ein samanløgd skattseting gjørd.

*14. gr.* Skattskyldan hjá tí deyða varir, sum fyrr nevnt, til deyðadagin, t.e. at ein skattseting skal gerast fyri tíðarskeiðið frá ársbyrjan og til deyðadagin, og skal hon, um biðið verður um tað, latast inn til skattavaldið sambært teim tíðarfreistum, sum nevndar eru í 3. stk. Nettoinntøkan skal so roknast upp til 12 mánaðir og skatturin roknast út av hesum tali. Tann skattur, sum skal gjaldast, skal svara til tíðarskeiðið frá ársbyrjan til deyðadagin. Fyribils goldin A- og B-skattur í sama tíðarskeiði skal dragast frá hesum tali.

Um henda uppgerð vísir ein frestandi skatt, sum er meira enn 5.000 kr., skal búgvið gjalda hann, jvnt. 2. stk.

Um uppgerðin vísir ein avlopsskatt, sum er meira enn 100 kr., kann búgvið krevja hann útgoldnan, jvnt. 2. stk.

Av praktiskum orsøkum verður tó í 1. stk. sagt, at ein slík uppgerð sum nevnd frammanfyri ikki skal gerast, tá fyribilsskatturin av inntøkunum verður mettur at svara til endaliga skattin. Bert um skattavaldið ella búgvið krevja, at ein endalig líkning skal gerast, skal hon

verða gjørd, og skulu krøvini í 2. stk., sum nevnt frammanfyri, tá verða lokin. Sambært 3. stk., so skal ein uppgerð latast líkningarvaldinum, um biðið verður um tað.

Krøvini til slíka uppgerð verða sett í 3. stk. og 6. stk., og samstundis verður avskriving loyvd eftir vanligu reglunum í avskrivingarlógini fyri tíðarskeiðið frá ársbyrjan til andlátið, tó so at tær verða roknaðar lutfalsliga fyri sama tíðarskeið, sum skattskyldan er fyri. Samstundis verður í 5. stk. kravt, at skattavaldið skal hava reist krav móti búnum, áðrenn 2 mánaðir eru lidnir frá tí, at ein uppgerð sambært 3. stk. er latin tí.

7. stk. áleggur líkningarráðnum at gera nærri reglur fyri slíkari endaligari uppgerð frá ársbyrjan og til deyðadagin. Hesar reglur eru eisini galdandi fyri búgv, sum verða tikin til privata skiftisviðgerð, um ein slík uppgerð ikki er latin inn, aftaná at 3 mánaðir eru gingnir, frá tí at biðið varð um hana.

Í 8. stk. verður sagt, at reglan í 1. stk. ikki er galdandi, um serognin hjá tí deyða verður skift, og hitt verður yvirtikið av tí óskifta búnum. Her verður farið fram eftir reglunum í 13. gr., og skal búgvið lata inn eina uppgerð yvir serognina hjá tí deyða á deyðadegnum.

*15. gr.* Bæði búgv, sum eru tikin til almenna og privata skiftisviðgerð, eru í princippinum skattskyldug frá andlátinum og til tann dag, búgvið endaliga verður uppgjørt. Av praktiskum grundum verður tó tann avmarking gjørd í 2. stk., at um inntøkan hjá búnum ikki er yvir 25.000 kr., og endaliga skiftið av búnum er lokið og latið skattavaldinum innan 15 mánaðir, skal skattur ikki verða goldin. Um endaliga uppgerðin av búnum verður gjørd og latin inn, aftaná at 15 mánaðir eru gingnir frá deyðadegnum, skal skattur gjaldast uttan mun til inntøkuna.

3. stk. ásetur, at búgv, sum verða skift alment ella latin frá privatari til almenna skiftisviðgerð, áðrenn 15 mánaðir eru lidnir frá deyðadegnum, og sum ikki sambært 2. stk. eru frítikin fyri at gjalda skatt, skulu rokna við inntøkuni frá deyðadegnum, og til endaliga uppgerðin av búnum verður gjørd.

*16. gr.* Her verður ásett, hvussu farast skal fram, um skattavaldið ikki góðtekur virðismetingina av ogn og skuld, tá búgvið verður endaliga uppgjørt, ella uppgerð verður gjørd sambært 14. gr.

6. stk. Útreiðslurnar til slíka virðismeting skulu gjaldast av búnum, um metingin er minst 10% hægri enn uppgjørt av búnum. Tá skatt-

skyldan hjá búnum heldur uppat, verða arvingarnir og eftirsitandi hjúnafelagin skattskyldug av tá møguligum inntøkum. Um partar verða tiknir úr búnum, so verður skattskyldan flutt til tann, sum hevur fingið part í búnum, og frá tí degi, hesin partur er tikin út, t.e. frá tí degi, tá inntøkur og útreiðslur av teimum úttiknu ognunum ikki longur falla til búgvið.

*17. gr.* Búgv, sum verða tikin til privata skiftisviðgerð, koma eisini undir reglurnar í 15. gr., 1. og 2. stk.

Er privata skiftisviðgerin ikki liðug, tá 15 mánaðir eru lidnir, skal, áðrenn ein mánaður er farin, ein uppgerð latast skattavaldinum yvir støðuna hjá búnum við endan á teimum 15 mánaðunum. Her skal verða greitt frá, hvat er lagt út til arvingarnar, og hvat enn er eftir í búnum. Tað, sum eftir er í búnum, skal verða uppgjørt til virðið í vanligum handli. Samstundis verður sjálvuppgáva latin inn yvir inntøkuna frá deyðadegnum og til endan á teimum 15 mánaðunum.

Í 4. stk. verður ásett, at skattskyldan hjá búnum endar, tá 15 mánaðir eru lidnir. Tá verður skattskyldan yvirtikin av arvingunum í mun til teirra lut í búnum. Bæði vinningur og tap av teimum ognum, sum tá tíðarfreistin er úti, ikki eru útlutað úr búnum, verða tikin við í skattskyldugu inntøkuna hjá búnum, sum um hesar ognir vóru seldar, tá tíðarfreistin gekk út. Arvingar og eftirsitandi hjúnafelagin skulu tá rokna við hesum virðum sum teirra skattligu útveganarvirðum.

*18. gr.* Um eitt alment skift búgv verður tikið uppaftur til skiftisviðgerðar, er tað fyrst skattskyldugt frá tí degi, skiftisrætturin hevur góðtikið at taka tað upp aftur til viðgerðar. Reglan í 15. gr., 1. stk. fevnir ikki um slík búgv. Tey verða viðgjørd eftir somu reglum, sum galda fyri búgv, sum verða skift stutt eftir deyðadagin.

Um privat skift búgv verða tikin aftur til skiftisviðgerðar, verður skattskyldan verandi hjá parthavarunum í búnum.

*19. gr.* Her verður tann spurningurin viðgjørdur, at eitt óskift búgv verður tikið til skiftisviðgerar, meðan eftirsitandi hjúnafelagin er á lívi. Skattskyldan verður her flutt til búgvið, tá skiftirætturin hevur góðtikið umbønina um skiftið. Annars eru somu reglur galdandi her viðvíkjandi uppgerðini av inntøkum, ognum og skuld, sum eru nevndar frammanfyri. Í 3. stk. verður ásett, at um eitt búgv, sum hevur verið tikið til almenna skiftisviðgerð, verður latið av skiftirættinum til at sita í óskiftum búgvi, so verður farið fram eftir 13. gr.,

og møgulig skatting eftir 14. gr. verður tikin aftur. Sambært 4. stk. er henda regla eisini galdandi fyri privat skift búgv.

Í 5. stk. verður ásett, at eitt búgv, sum hevur verið undir almennari skiftisviðgerð og verður latið til privata skiftisviðgerð, aftaná at 15 mánaðir eru lidnir, verður viðgjørt eftir 17. gr., 2. og 4. stk., tá tað, at búgvið er latið til privata skiftisviðgerð, kemur í staðin fyri, at freistin upp á 15 mánaðir er úti.

Í 6. stk. verður ásett, at um eitt búgv, sum hevur verið til privata skiftisviðgerð, aftan á 15 mánaðir verður latið til almenna skiftisviðgerð, verður tað ikki aftur skattskyldugt, men eru arvingarnir og eftirsitandi hjúnafelagi støðugt skattskyldugir av sínum parti í búnum.

*20. gr.* ásetur, at landsstýrið ger nærri reglur um sjálvuppgávuna, endaligu búsuppgerðina, og hvussu upplýsingarnar frá skiftirættinum skulu latast skattavaldinum. Í búgvum, sum verða tikin til privata skiftisviðgerð, skulu arvingarnir altíð velja ein felags umboðsmann fyri seg, sum skattamyndugleikarnir kunnu snúgva sær til.

*21. gr.* Tá partafeløg og onnur feløg ikki koma undir lógina um samtíðarskatt, eru reglurnar fyri, nær sjálvuppgávan skal verða innlatin, broyttar. Her hava vit reglur fyri, at nýstovnað feløg v.m., hvørs roknskaparár endar fyri 31. december, verða sett í skatt av allari inntøkuni í roknskaparárinum, sama hvussu langt tað er. Í 3. stk. er tó ein nýggj regla innsett, sum sigur, at hóast reglurnar í 1. stk. kann 1. roknskaparskeiðið ikki fevna um meira enn tvey álmanakkaár.

*22. gr.* Her eru ongar broytingar gjørdar frá teimum núverandi reglunum. Reglan sigur okkum, hvussu persónar, sum hava avmarkaða skattskyldu her á landi, skulu verða settir í skatt fyrstu ferð, og eisini hvussu skal farast fram, tá inntøkukeldan verður uppgivin her.

## Viðmerkingar til 3. kapittul

Í 3. kapittli verður ásett, hvussu skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. T.e., bæði hvussu sjálv inntøkuuppgerðin skal gerast, og hvussu langt tað skattskylduga tíðarskeiðið er, hon skal gerast upp fyri.

*Í 23. gr.* 2. stk. verður sagt, at skattaárið er tað tíðarskeið, sum skattaálíkningin er gjørd fyri, og sum skattskyldan er miðað eftir. Í gomlu lógini stóð beinleiðis, at hetta var tíðarskeiðið frá 1. apríl á hvørjum ári til 31. mars árið eftir. Skatturin varð tá álíknaður eftir inntøkuni í álmanakkaárinum frammanundan, men varð álíkningin gjørd fyri skattaárið, sum byrjaði 1. apríl, aftaná at tað inntøkuár, sum inntøkan varð vunnin í, var gingið út. Tann álíknaði skatturin fell til gjaldingar leypandi í skattaárinum, og sjálv skattgjaldingin var soleiðis treytað av, at viðkomandi var skattskyldugur í hesum tíðarskeiði. Fell skattskyldan av einhvørji orsøk burtur, fell skyldan at gjalda tann álíknaða, men ikki gjaldkomna skattin, burtur frá sama degi.

Í hesum lógaruppskoti um samtíðarskatt fellur tíðarbilið, millum nær inntøka verður forvunnin, og nær skattur av henni fellur til gjaldingar, burtur fyri persónar, tá lógin miðar ímóti, at skatturin fellur til gjaldingar, so hvørt sum inntøkan verður vunnin.

*Í 24. gr.* verður sagt, at inntøkuárið hjá persónum er álmanakkaárið, sum endar fyri ta endaligu álíkningina, og tað hjá feløgum er tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum framnanundan.

Er skattskyldan fyri eitt styttri tíðarskeið, t.d. tá ein persónur við flyting til Føroya kemur undir skattskyldu mitt í álmanakkaárinum, verða allir loyvdir frádráttir roknaðir lutfalsliga. Hetta merkir, at tá inntøkan bert er fyri ein part av árinum, verða allir frádráttirnir eisini bert roknaðir fyri henda partin av inntøkuárinum. Áðrenn sjálv skattaútrokningin verður gjørd, verður inntøkan umroknað til heilársinntøku. Tann útroknaði skatturin verður síðani lækkaður aftur svarandi til tað tíðarskeið, skattskyldan varir. Soleiðis fær hann, sum hevur verið undir fullari skattskyldu í bert 3 mánaðir av árinum, ein frádrátt svarandi til 1/4 av teimum føstu ársfrádráttunum.

Inntøkan, sum hann vinnur aftan á ársskiftið, verður tá ein partur av næsta inntøkuári, og um hann verður verandi í Føroyum, verður næsta árs skattseting sum hjá øllum øðrum uppgjørd, tá hetta álmanakkaárið er at enda, men fer hann avstað aftur áðrenn, verður aftur gjørd ein lík skattseting við umrokning til heilársinntøku eftir tí dagatali, hann hevur verið í Føroyum frá ársskiftinum at rokna.

Í hesum dømi er gingið út frá, at maðurin er komin undir fulla

skattskyldu í Føroyum. Kemur hann bara undir avmarkaða skattskyldu, verður roknistykki fyri alt tað hitt sama, bert hevur hann tá ikki rætt til somu frádráttir, tá bert teir, ið beinleiðis hava samband við at vinna inntøkurnar, verður loyvt at draga frá her. Eitt nú verður eingin rentu- ella persónsfrádráttur givin persónum undir avmarkaðari skattskyldu.

*Í 25., 26. og 27. grein* verður ásett, hvørjar veitingar verða roknaðar uppí, tá skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. Her verður sligið fast, at tær fevna um alla inntøku, uttan mun til um hon stavar úr Føroyum ella ikki. Hetta er sjálvandi bert galdandi, tá ein er undir fullari skattskyldu (sí kap. 1).

Í mun til núverandi lóggávu eru ongar broytingar gjørdar uttan í 26. gr., har virðið av vørum og framleiðslum, sum hin skattskyldugi hevur tikið úr virki sínum til egna nýtslu, nú skal metast eftir keypsvirðinum í staðin fyri sum í núverandi lóg eftir smásøluvirðinum.

*Til 28. gr.*

Reglurnar í hesi grein eru nýggjar í mun til núverandi lóg, og eru tær ein beinleiðis avleiðing av, at farið verður yvir til samtíðarskatt.

Sum nærri frágreitt í 6. kapitli verður skattur eftirhildin, tá lønin verður útgoldin, og er øll samtíðarskattaskipanin bygd á ta meginreglu, at skatturin fellur til gjaldingar, samstundis sum inntøkan verður útgoldin tí skattskylduga.

Í núverandi lóg er meginreglan tann, at inntøkan verður skattskyldug, tá rættur til hana er vunnin, og skal hon takast til inntøku í tí inntøkuárinum, hon er vunnin, uttan mun til, um hon er útgoldin ella ikki.

Henda meginregla er fyri alt tað varðveitt í hesi lóg, men við samtíðarskattaskipanini, har miðað verður ímóti, at fyribilsskattsetingin skal verða so endalig sum gjørligt, so seinni broytingar ikki vera ov nógvar, verða allar A-inntøkur skattskyldugar, tá tær verða útgoldnar. Verður ein lønarinntøka, sum vunnin er í desember í einum ári, ikki útgoldin fyrr enn árið eftir, verður hon í útrokningarskipanini roknað upp í A-inntøkuna í tí ári, hon verður útgoldin.

Skipanin byggir sostatt á, at tey einstøku inntøkuárini verða endað 31. desember á hvørjum ári, og tær inntøkurnar, sum tá eru goldnar, eru samanløgdu A-inntøkurnar í tí árinum.

A-inntøkurnar, sum útgoldnar verða í tí nýggja árinum, verða tá at rokna sum skattskyldugar í hesum ári, tó at tær eru vunnar í tí gamla. Skattur verður eftirhildin í teimum á vanligan hátt í tí nýggja árinum. Í allarflestum førum fær hetta lítlan praktiskan týdning hjá tí einstaka skattaborgaranum.

Í 1. stk. verður tó ásett, at útgjaldingin skal vera liður í vanligu arbeiðsgongd arbeiðsgevarans, soleiðis at skilja, at útgjaldingin skal fylgja tí vanliga útgjaldingarlagnum hjá arbeiðsgevaranum.

Eisini verður í 1. stk. ásett, at løn, sum ikki er útgoldin við endan á tí álmanakkaári, sum kemur beint aftan á tað ár, tá løntakarin hevur vunnið rættin til hana, verður at taka við til skattingar í hesum seinna inntøkuári. Tað týðir sostatt, at um lønin ikki er útgoldin, og skatturin tískil ikki er afturhildin í afturhaldsskipanini, verður løntakarin at taka hana við á sjálvuppgávu sína fyri hetta inntøkuárið, og fær hann tá eina skattarokning, sum fellur til gjaldingar eftir reglunum fyri írestandi skatt. Henda fyriskipan er gjørd, tá maður, sum hevur stóra inntøku og tískil ikki vil hava fyri neyðini at fáa hana alla útgoldna, annars við at lata hesa óútgoldnu løn sína verða standandi á konto hjá arbeiðsgevara sínum hevði sloppið undan at rindað skatt av henni, og kundi hann tá á henda hátt, so leingi honum lysti, latið óskattaða uppsparing staðið og borið rentu.

Her skal eisini viðmerkjast, at upphæddir, sum útgoldnar verða á conto fyri eitt arbeiði, har samanlagda lønarupphæddin ikki er endaliga fastløgd, sum t.d. tá talan er um hýruavrokningar fyri longri túrar og árslønir hjá høvuðspartaeigarum, sum ikki verða endaliga fastlagdar, fyrr enn roknskapurin verður gjørdur, verða roknaðar sum vanlig A-inntøka, sum skal gjaldast móttakaranum um afturhaldsskipanina.

Víðari verður í 3. stk. í hesi grein ásett, at um skattskylda løntakarans heldur uppat, verður inntøkan skattskyldug í seinasta lagi, tá skattskyldan heldur uppat. Hetta vil t.d. vera, tá maður flytur av landinum, og ein partur av løn hansara enn ikki er útgoldin honum, og lønin tí ikki er flutt um afturhaldsskipanina. Skattskylda hansara er uppathildin, men lønin skal sum áður gjaldast honum um afturhaldsskipanina, har hon verður roknað upp í skattskyldugu inntøku hansara í tí tíðarskeiðinum, skattskylda hansara til Føroya stóð við. Eisini skal hon takast við í tí endaligu skattauppgerðini.

Í 4. stk. verður heimilað líkningarráðnum at áseta, at ávís A-inntøka ikki skal ganga eftir reglunum í 1. stk., t.e. at hon skal verða skattskyldug, tá hon verður vunnin. Henda grein verður at nýta, tá høvuðsreglan møguliga roynist trupul ella órímilig at nýta.

*Til 29. gr.*
Í høvuðsheitunum er einki broytt í mun til núverandi lóg. Tó skal viðmerkjast, at í 9. stk. er tikið við í lógini, at kostnaðarviðbót hjá løgtingsmonnum eins og fólkatingsmonnum er ikki skattskyldug. Hetta var frammanundan ásett í serstakari lóg.

Eisini er í 14. petti ásett, at afturberingin, sum útgoldin verður limunum í keypsamtøkum í mun til tað, teir hava keypt, ikki verður at rokna sum skattskyldug inntøka, sjálvt um hon smb. 36. gr. kann dragast frá í skattskyldugu inntøkuni hjá keypsamtøkuni. Hetta er ásett av praktiskum orsøkum, tá eftirlitið við inntøkuføringini av hesum upphæddum mundi verið alt ov arbeiðskrevjandi í mun til tær einstøku upphæddirnar.

*Til 30. gr.*
Her er tann broyting gjørd, at um tað ásetta 20% avgjaldið av vinningsbýti ikki verður goldið Føroya Gjaldstovu ásettu tíðina, verður roknað 1% í rentu um mánaðin frá 1. í mánaðinum eftir, at goldið skuldi verið. Henda renta kann ikki dragast frá í skattauppgerðini. Somuleiðis verður nú heimild til at panta fyri hetta avgjald.

*Til 32. gr.*
32. grein er nýggj í mun til núverandi lóg og gevur heimild til at draga frá í skattauppgerðini útreiðslur til royndar- og granskingarvirksemi, sum hin skattskyldugi hevur havt, áðrenn ein verulig vinna er byrjað.

Tað kann vera kostnaðarmikið at gera royndir á nýggjum økjum. Núverandi skattalóg hevur í princippinum ikki loyvt frádrátt fyri slíkar útreiðslur, tá kravt hevur verið, at ein vinnulig inntøka skal vera, áðrenn talað kann verða um frádráttir. Nú kunnu hesar útreiðslur goymast saman og dragast frá, tá ein verulig vinna er komin í gongd. 1. árið og 3 tey næstu árini, alt eftir sum hin skattskyldugi heldur vera best.

Sjálvandi má takast hædd fyri, at tá útreiðslur av slíkum slag skulu dragast frá, so má ein verulig vinna vera komin í gongd. Smærri inntøkur við sølu av royndarframleiðslu kann ikki metast, sum um virkið var farið í gongd. Tó kunnu útreiðslur dragast frá ájavnt við inntøkurnar av virkseminum hesa tíðina.

Royndar- og granskingarvirksemi í sambandi við ráevni í undirgrundini koma ikki undir hesa reglu.

*Til 33. gr.*
Her er komin við í lógina galdandi praksis um frádrátt fyri útreiðslur til ferðing, reklamu o.t. í sambandi við virkseini hjá vinnuvirkjum. Viðvíkjandi reklamu kann ofta vera drúgt, áðrenn tær ávirka søluna, og tí kunnu reklamur, sum gjørdar eru í einum inntøkuári, ikki gera nyttu fyrr enn í seinni árum. Tí verður nú loyvt at draga slíkar útreiðslur frá í tí inntøkuári, tær koma fyri, tó at inntøkan ikki kemur fyrr enn í seinni árum.

Útreiðslur til provisión, stovningarprovisión í sambandi við lántøku eru nú nevndar í lógaruppskotinum sum loyvdur frádráttur. Tó ikki gjald fyri tinglestur. Hall í skattauppgerðini eitt ár kann dragast frá 4 tey næstu árini. Hetta er ein víðkan í mun til núverandi lóg, ið heimilar frádrátt gjøgnum 3 ár. Samstundis verður eisini fastsligið, at hall í sambandi við trotabúgv o.l. bert verður loyvt skattliga frádrigið í tann mun, tað verður goldið. Ofta verður ein størri ella minni partur av tí skuldini, ið stendur eftir, tá vinnuvirki heldur uppat, verður avtikið o.l., strikað av ognarunum, ella ein avtala verður gjørd um akkord, har ein ávísur partur verður eftirgivin, meðan hitt skal gjaldast. Skuldarin kann í hesum førum bert draga frá tann partin, sum goldin verður, og verður frádráttur í hesum førum ikki givin, fyrr enn goldið er.

*Til 35. gr.*
Henda grein er nýggj í mun til núverandi lóggávu, soleiðis at skilja, at eingin beinleiðis lógargrein var um hesi viðurskifti. Tó hevur verið galdandi ein praksis eftir teimum reglum, sum nú verða lagdar inn í hesa lógargrein.

Høvuðsreglan í skattalóg okkara er, at ognarminking ikki er skattskyldugur frádráttur, eins og ognarvøkstur ikki er skattskyldug inntøka, jvf. 29. gr.

Tó hevur frádráttur fyri kurstap verið loyvdur eftir hesum reglum:

1. Kursvinningur/tap hjá vinnuvirki, sum keypir vørur í fremmandum gjaldoyra, og kursurin á tí broytist frá keypsdegnum til gjaldsdagin, har verður hesin kursvinningur/tap at rokna sum skattlig inntøka/útreiðsla og verður at bóka um rakstur.

2. Hjá vinnuvirki, sum til nýtslu í virki sínum keypir rakstrargøgn, sum eru undir avskrivingarlógini, t.d. skip ella skipspartar, verður keypspeningurin í fremmandum gjaldoyra gjørdur upp við kursinum yvirtøkudagin sum grundarlag, og verður hetta sostatt partur av útveganarvirðinum og verður avskrivað saman við tí.

Kursvinningur/tap, sum kemur fram í sambandi við avdrátt av

lánum í fremmandum gjaldoyra, verður at rokna sum skattlig inntøka/útreiðsla og verður bókað um rakstur. Sum dømi kann nevnast skip, sum fíggjað er við lánum í útlendskum gjaldoyra; her verður tað goldna (realiseraða) kurstapið at føra um rakstur, meðan tann enn ikki goldni parturin, t.e. tað roknaða kurstapið, sum kemur fram, um restlánið á hvørjum ári tann 31.12 verður umroknað til dagsins kurs, ikki kann útreiðsluførast. Á henda hátt verður frádráttur givin, so hvørt sum kurstapið verður goldið, t.e. so hvørt sum lánið verður afturgoldið, og fyri tann kurs, sum er galdandi, tá tey einstøku rentu- og avdráttargjøldini verða goldin.

*Til 36. gr.*
Tann afturberingin, sum útgoldin verður limunum hjá keypsamtøkum í mun til tað, teir hava keypt fyri í árinum, og sum smb. 29. gr., 14. petti ikki er skattskyldig inntøka hjá móttakaranum, verður í hesi grein loyvt at draga frá í inntøkuuppgerðini hjá keypsamtøkuni.

*Til 38. gr.*
Renta, sum hin skattskyldugi má gjalda fyri ov seint goldnan skatt, kann ikki dragast frá í skattauppgerðini. Somuleiðis skal renta, sum hin skattskyldugi vinnur av ov nógv goldnum skatti, ikki teljast við í skattskyldugu inntøkuni.

*Til 39. og 40. gr.*
Reglurnar viðv. endaligu skattauppgerðini hjá tí deyða og reglurnar um skatting av deyðsbúgvum eru gjørdar so einfaldar sum gjørligt.

Óskift búgv:
Eftirsitandi hjúnafelagi, sum situr í óskiftum búgvi, verður settur í skatt av allari inntøku hjúnanna í inntøkuárinum, tó soleiðis, at tá ið konan hevur havt inntøku, sum hon er vorðin serskattað av, skal henda inntøka gerast upp fyri seg fram til deyðadagin, men øll onnur inntøka hjúnanna skal ganga inn í eina høvuðsuppgerð. Tann fyribils inngoldni skatturin bæði hjá henni og manninum verður tá mótroknaður í hesum báðum uppgerðunum.

Hevur kona, sum situr í óskiftum búgvi, onga inntøku havt, hevur hesin skattsetingarháttur tað við sær, at hon verður sett í skatt av hansara inntøku, sum var hetta inntøka vunnin í øllum árinum, og hevur hetta vanliga við sær, at tann skatturin, sum fyribils er goldin, er ov høgur, og fær hon tá munin afturgoldnan.

Eftirsitandi hjúnafelagi, sum situr í óskiftum búgvi og hevur yvirtikið búgvið skattliga, hevur somu rættindi og somu skyldur, sum tann deyði hevði. Hetta týðir, at um talað er um vinnuligan rakstur av einhvørjum slag, skal eftirsitandi hjúnafelagi gera upp á sama hátt, sum hin deyði hevði gjørt, og verða allar ognir avskrivaðar við teimum saldovirðum, sum tær høvdu frammanundan, og allar avsetanir og avskrivingar verða roknaðar sum gjørdar av tí eftirsitandi.

Skift búgv:

Eftirsitandi hjúnafelagi verður í førum, tá skift verður, settur í skatt av egnu arbeiðsinntøku síni í øllum inntøkuárinum. Í tann mun, hann í skattseting síni hevur havt inntøkur, ið ikki eru A-inntøka, og frádráttir, sum ikki hava samband við A-inntøku, t.d. B-inntøka stavandi frá sjálvstøðugum vinnuvirki, privatur rentufrádráttur, sum býttur hevur verið millum hjúnafelagar, frádráttur fyri hall og avskriving av skipsparti, v.m., má henda inntøka og hesin frádráttur verða uppgjørd á deyðadegnum, og verður tá bert tann parturin, sum fellur fyri deyðadagin, skattaður saman við A-inntøkuni sum vanligt, men tann írestandi parturin fer inn í búgvið saman við teirri tilhoyrandi ognini og skuldini.

Uppí endaligu inntøkuuppgerðina hjá tí deyða smb. 40. gr. 1. stk. kemur øll arbeiðsinntøka hjá honum, eisini um hon ikki er útgoldin fyrr enn eftir deyðadagin. Hevur tann deyði umframt inntøku av egnum arbeiði eisini havt inntøku av einhvørjum øðrum slag, t.d. inntøku av vinnuvirki, rentuinntøku, inntøku av útleigu v.m., skal henda inntøka teljast við í endaligu inntøkuuppgerðina við tí lutfalsliga partinum, sum svarar til tíðina, frá tí at inntøkuárið byrjaði, og til deyðadagin.

Í hesi inntøkuuppgerð verða nýttar somu reglur, sum tann deyði sjálvur hevði kunnað nýtt. Allar vanligar avskrivingar, burturleggingar v.m. fyri tann lutfalsliga partin av árinum kunnu sostatt gerast. Tó verður avseting í fløgugrunn ikki loyvd.

Henda samanlagda inntøkan fram til deyðadagin uppgjørd eftir omanfyri standandi reglum verður nú skattað eftir somu reglum, sum umrøddar eru frammanfyri hjá tí, sum skattskyldan hjá heldur uppat mitt í árinum, t.e. inntøkan til deyðadagin verður upproknað til heilársinntøku, skattur verður útroknaður og verður síðan lækkaður aftur í mun til skattskylduga tíðarskeiðið.

Tann írestandi parturin av B-inntøkum frá tíðini eftir deyðadagin

og ónýttur frádráttur, so sum rentufrádráttur, hall av vinnuvirki o.a., verður, eins og gjørt varð hesum viðvíkjandi hjá eftirverandi hjúnafelaga, tá fluttur inn í búgvið og verður at draga frá í inntøkuuppgerð tess.

Uppgerð av skattskyldugu inntøkuni hjá búnum:

Sum tað skilst av tí, omanfyri er sagt, fevnir skattskylduga inntøkan í búnum í fyrstu syftu um allar tær inntøkur og útreiðslur, sum fluttar verða bæði frá inntøkuuppgerðini hjá tí deyða og frá inntøkuuppgerðini hjá eftirverandi hjúnafelaganum fyri tíðarskeiðið eftir andlátið. Harumframt kemur inntøka av einum og hvørjum slag, jvf. tær vanligu reglurnar um, hvat skattskyldugt er.

Verður búgvið ikki skift stutt eftir andlátið, og tann endaliga inntøkuuppgerðin smb. skiftisviðgerðini tí ikki kann gerast, verður búgvið sett í skatt eftir vanligum reglum av inntøkum og útreiðslum. Tað týðir við øðrum orðum, at búgvið kann avskriva, leggja burtur v.m., og verða nýtt tey saldovirði, sum komu fram í seinastu inntøkuuppgerð, áðrenn virðini gingu inn í búgvið. Inntøkuár tess er álmanakkaárið, soleiðis at tað fyrsta inntøkuskeiðið verður tíðin frá tí degnum, búgvið varð tikið undir skiftisviðgerð (sum vanliga vil vera deyðadagurin), og til næsta 31. desember. Inntøkan í hesum tíðarskeiði verður í skattaútrokningini upproknað til heilársinntøku, og útroknaði skatturin verður síðani lækkaður lutfalsliga, á sama hátt sum frágreitt er omanfyri.

Verður búgvið skift innan 15 mánaðir eftir andlátið, verður loyvt, at hetta verður roknað sum eitt samanhangandi inntøkuskeið uttan umrokning til heilársinntøku.

Tá eitt búgv verður skift, skulu í tí endaligu uppgerð tess smb. 7. stk. takast til inntøku aftur allar burturleggingar av einum og hvørjum slag, eisini tær, sum gjørdar eru, áðrenn virðini eru komin inn í búgvið. Allar ognir, sum avskrivaðar eru, skulu sostatt metast sum seldar í seinasta lagi uppgerðardagin, og skal ein vinningur, sum tá kemur fram, teljast við í skattskyldugu inntøkuna, eins og eitt hall verður frádrigið. Somuleiðis skal mettur vinningur ella hall við sølu av ognum, sum keyptar eru við tí í hyggju at verða seldar aftur við vinningi, verða tikin við í uppgerðini. Virðini skulu ásetast eftir virðinum í vanligum handli, og kann líkningarráðið krevja, at tey verða mett av serkønum monnum.

Eftir uppgerðardagin fara ognirnar til arvingarnar, og skal møgulig inntøka tá skattast hjá teimum. Arvingarnir hefta fyri møguligan ógoldnan skatt hjá búnum í tann mun, teir hava fingið útlagt arv úr

búnum. Verður eitt búgv uppgjørt við halli, verður ikki loyvt at flyta hetta hall til inntøkuuppgerðina hjá arvingunum.

## Viðmerkingar til 4. kapittul

Reglurnar til hvørja kommunu, skattskyldugur skal svara skatt, eru at siga tær somu sum í núgaldandi lóg. Tó er ein týðandi broyting gjørd.

*Í 41. gr., 2. stk.* er soleiðis ásett, at persónar verða settir í skatt til ta kommunu, har teir hava fast tilhald fyri seg (og húskið sítt) tann 1. oktober í árinum innan inntøkuárið.

Hetta týðir, at tað er *bústaðurin 1. oktober,* sum er avgerandi fyri, í hvørjari kommunu persónur verður settur í skatt næsta ár.

Henda broyting er ein avleiðing av samtíðarskattaskipanini, sum miðar ímóti, at skattsetingin skal vera so endalig sum gjørligt.

Smb. ásetanum aðrastaðni í hesi lóg skal innan 1. oktober á hvørjum ári gerast ein fyribilsskattaskráseting fyri næsta inntøkuár, og skulu í henni vera allir persónar, ið tá eru búsettir í kommununi.

Flytur persónur eftir henda dagin úr kommununi, verður tann gjørda skattaskráseting hansara fyri næsta inntøkuár galdandi hetta árið út. Hann fær sostatt onga broyting, sum stavar frá, at hann er fluttur.

Tað verður soleiðis ikki fyrr enn við næstu fyribilsskattaskráseting fyrstkomandi 1. oktober, at hann verður settur í skatt beinleiðis til tilflytingarkommununa eftir teimum reglum, sum eru galdandi í henni.

Viðv. feløgum v.m. verður í hesi grein ásett, at tey eru skyldug at rinda skatt til ta kommunum, har tey eru skrásett, sí tó 48. gr.

Eins og í núverandi lóg verður tann regla galdandi, at uppihaldari, sum flytur í aðra kommunu í Føroyum at arbeiða har, varðveitir kommunuskattaskylduna til heimakommununa, soleingi hann hevur húshald sítt har.

*Í 3. stk.* Í hesi grein verður ásett, at treytin fyri at koma undir skattskyldu til eina kommunu er, at viðkomandi hevur havt fast

tilhald har í minsta lagi í 3 mánaðir, samfelt ella við millumbilum. Tó verður sagt, at um persónur flytur millum kommunur og ikki hevur havt tilhald í nakrari av teimum í 3 mánaðir, eiga allar kommunur, har hann hevur hildið til í minsta lagi ein mánað, rætt til sín lutfalsliga part av kommunuskattinum.

*Í 4. stk.* verður ásett, at persónar, sum vinna inntøku sína á sjónum, og sum ikki tann 1. oktober hava fast tilhald í nakrari kommunu í Føroyum, eru skattskyldugir til ta kommunu, har teir vanliga halda til, tá teir eru í landi, og ber ikki til at siga, hvar hetta er, verður skattskyldan til ta kommunu, har skipið er heimahoyrandi.

Er hann í tílíkum føri við útlendskum skipi, verður hann at rokna sum skattskyldugur til ta kommunu, har hann seinast varð settur í skatt. Landsstýrið tekur avgerð í ivamálum.

*Í 5. stk.* verður ásett, at persónar, sum í heilum skifta tilhald, verða settir í skatt til ta kommunu, sum má roknast at vera heimakommuna teirra. Eisini her tekur landsstýrið í ivamálum endaligu avgerðina.

*Í 42. gr.* verður viðgjørd skattskyldan hjá persónum, sum hava tilhald í einari kommunu, tí teir eru á sjúkrahúski, í fangahúsi o.l., og hjá teimum, sum í almennum ørindum eru í aðrari kommunu enn í vanligu tilhaldskommunu síni. Teir verða eins og í núgaldandi lóg settir í skatt í heimakommunu síni, um teir annas lúka vanligu treytirnar fyri skattskyldu til hennara.

*Í 43. gr.* verður ásett, at um kommunala líkningarvaldið metir, at tann kommunan, sum ein persónur er fyribilsskrásettur í 1. oktober, ikki er tann rætta, hevur hon rætt til at kæra um hesa skráseting til 5 mánaðir aftaná, at skattskyldan hjá hesum persóni tók við. Skattgjaldarin sjálvur hevur eisini rætt til at kæra um hetta, og skal kæran vera send avvarðandi kommunala líkningarvaldi innan 3 mánaðir aftaná, at hann hevur fingið boð um, hvar hann er skattskyldugur.

Í teimum førum, kommunur og/ella persónurin sjálvur ikki eru á einum máli um, hvar hann skal vera skattskyldugur, kann málið verða lagt fyri landsstýrið til avgerðar. Skattgjaldarin kann tó í slíkum førum innan 4 vikur eftir, at hann hevur fingið boð um avgerð landsstýrisins, kæra hesa avgerð til dómsvaldið.

Um persónur flytur til Føroya úr útlondum ella kemur undan sjómansskattaskipanini, verður hann settur í skatt til ta kommunu,

sum má metast at verða tilhaldskommuna hansara smb. 41. gr. Tekur henda skattskylda við í oktober ársfjórðingi, stendur henda skattskylda við eisini næsta inntøkuár.

*Í 44. gr.* verður ásett, at tilflytingarkommunan tó hevur krav um skatt frá teimum persónum, sum flyta til kommununa aftaná, at teir eru fyribilsskrásettir í aðrari kommunu, og verður her ásett, at skatturin skal býtast lutfalsliga millum kommunurnar í mun til tað tíðarskeið, skattgjaldarin hevur búð í hvørjari teirra, og verður lutfallið roknað frá byrjanini av tí fjórðingsári, sum kemur aftan á flytingina.

Tilflytingarkommunan fær sostatt flutt tann skattin, sum hevði verið goldin til fráflytingarkommuna, við teimum kommunuskattastigum, sum galda í henni.

*Í 45. gr.* verður ásett, at um ein kommuna ikki hevur fingið tann partin av kommunuskattinum, sum hon heldur seg eiga rætt til smb. 44. gr. 2. stk., ella heldur, at býtið av skattinum millum kommunurnar ikki er rætt, hevur hon rætt til at kæra um hetta til hina kommununa innan 1 ár og 3 mánaðir, frá tí at álmanakkaárið, ið kært verður um, er úti. Kunnu kommunurnar ikki semjast um býtið, hevur líkningarráðið avgerðarrættin. Reglurnar um, hvussu býtið av kommunuskattinum í slíkum førum verður útroknað, verða gjørdar av líkningarráðnum.

Ásetingarnar í *46. gr.* eru óbroyttar í mun til núverandi lóggávu, men í *47. gr.* verður sum nakað nýtt ásett, at kommunu- og kirkjuskattaprosentið fyri næsta inntøkuár skal ásetast í kommununi longu í seinnu helvt av september mánaði í árinum framman undan inntøkuárinum.

Henda lóg hevur ta broyting við sær, at tann endaliga álíkningin, sum verður gjørd, aftaná at inntøkuárið er gingið út, ikki sum áður kann nýtast sum grundarlag undir fíggjarætlanini fyri komandi fíggjarár. Tann endaliga álíkningin verður tá ein uppgerð um tann skattin, sum álíknaður er fyri farna álmanakkaár samanhildin við tær skattaupphæddirnar, sum eru fyribils inngoldnar.

Tá fíggjarætlanin skal leggjast, má hon tí grundast á eina metta inntøku fyri komandi inntøkuár, og verða kommunuskattaprosentini fyri komandi inntøkuár at seta út frá hesum, sí í hesum sambandi

eisini gr. 59 í 6. kapitli, har landsstýrinum er heimilað at áseta tey, um tey ikki eru ásett av kommunustýrunum innan 1. oktober. Skattaprosentini, sum tá verða ásett, verða endalig og kunnu hvørki broytast í inntøkuárinum ella seinni, t.d. undir álíkningini, um hon vísir, at ov lítið er innkomið í mun til tað, kommununi ella landinum tørvar.

## Viðmerkingar til 5. kapittul

Reglurnar um skattskyldu til tilhalds- og atvinnukommunu eru í høvuðsheitunum tær somu sum eftir núgaldandi lóg, og snúgva tær broytingarnar, ið her verða skotnar upp, seg fyrst og fremst um reglurnar fyri innsending av sjálvuppgávu og um útrokning og innheinting av skattinum.

Sum nú er, letur hin skattskyldugi inn sjálvuppgávu bæði til atvinnu- og tilhaldskommunu, og fær hann eina skattarokning frá hvørjari. Tá landsskatturin av atvinnuinntøkuni ikki verður roknaður í atvinnukommununi, men skal roknast av samanløgdu inntøkum skattgjaldarans undir einum, eigur atvinnuinntøkan eisini at verða uppgivin í tilhaldskommununi, og skal samanlagda skattarokningin í henni tí lækkast við kommunuskattinum, sum fellur á atvinnuinntøkuna og longu er álíknaður í atvinnukommununi.

At halda skil á hesum og ansa eftir, at skattgjaldaranum ikki verður álíknaður dupultur kommunuskattur, ella møguliga als ikki verður álíknaður nakar landsskattur av atvinnuinntøkuni yvirhøvur, hevur roynst ógvuliga tíðarkrevjandi, og eru tær mongu broytingarnar ringar at skilja hjá skattgjaldaranum.

Við teimum broytingum, sum her verða skotnar upp, verður miðað móti at gera reglurnar munandi einfaldari at umsita hjá skattavaldinum og eisini nógv lættari hjá skattgjaldaranum at skilja.

*Í 48. gr.* verður greitt frá, undir hvørjum umstøðum persónur ella felag skal rinda kommunuskatt til eina ella fleiri atvinnukommunur umframt møguliga til tilhaldskommununa.

Reglurnar eru her, at tá persónur ella felag, sum hevur fulla skattskyldu til eina kommunu í Føroyum, samstundis hevur inntøku av virki í aðrari kommunu enn tilhaldskommununi, so sum handils-, handverks-, verksmiðju- ella annað virki, tá verður hann atvinnuskattskyldugur til ta kommunu, har virkið er.

*Í 49. gr.* verður ásett, at um persónur í árinum tekur upp ella heldur uppat við sovorðnari vinnu, sum ger hann atvinnuskattskyldugan, tekur atvinnuskattskyldan við/ávikavist heldur uppat, tann dagin byrjað verður við virkinum/virkið heldur uppat.

Skatturin verður javnaður, tá endaliga skattaálíkningin fyri avvarðandi inntøkuskeið verður gjørd.

Eisini verður her ásett, at um ein persónur, sum hevur sjálvstøðugt virki í tilhaldskommununi, flytur úr henni í aðra kommunu, uttan at virkið flytur við, verður hann atvinnuskattskyldugur til fráflytingarkommununa av inntøkuni av vinnuvirkinum frá tí degi, tilhaldsskattskyldan heldur uppat, og er tað smb. 44. gr. frá byrjanini av fjórðingsárinum aftan á fráflytingina, eins og hann verður tilhaldsskattskyldugur til tilflytingarkommununa frá sama degi.

Somuleiðis verður ásett, at tá persónur, sum hevur verið atvinnuskattskyldugur av sjálvstøðugum virki í einari kommunu, flytur í hana at búgva, heldur atvinnuskattskylda hansara uppat frá tí degi, hann verður settur í tilhaldskommunuskatt til hennara.

Í 5. stk. í hesi grein verður ásett, at skattskyldan til atvinnukommununa hjá feløgum tekur við, tá felagið tekur upp skattskyldugt virksemi í atvinnukommununi, og heldur uppat, tá virksemið heldur uppat. Tá feløgini smb. hesa lóg ikki koma undir samtíðarskattaskipanina, men framvegis verða at skatta afturút av inntøkuni í inntøkuskeiðinum framman undan skattaárinum, vil tað siga, at skatturin av atvinnuinntøkuni í tí fyrsta inntøkuskeiðinum verður álíknaður og fellur til gjaldingar saman við skattinum til heimstaðarkommununa fyri avvarðandi inntøkuskeið í skattaárinum aftan á útgongu roknskaparskeiðsins.

Skatturin av atvinnuinntøkuni í inntøkuskeiðinum frá seinastu skattseting, og fram til virksemið í atvinnukommununi verður niðurlagt, skal somuleiðis álíknast og gjaldast samstundis við skattinum, sum álíknaður verður í heimstaðarkommununi fyri avvarðandi inntøkuskeið. Reglan í núverandi lóg, sum ásetur, at tá virksemið heldur uppat í atvinnukommununi, skal gerast ein serstøk líkning fyri inntøkuna í atvinnukommununi fyri hetta seinasta inntøkuskeiðið, verður sostatt avtikin. Felagið er støðugt skattskyldugt til heimstaðarkommununa, og verður hetta seinasta inntøkuskeiðið í atvinnukommununi álíknað á vanligan hátt og skatturin fluttur til hennara sum vanligt í skattaárinum aftaná.

Tað er sostatt bert, tá ið virksemið hjá felagnum sum heild verður niðurlagt, at tað verður gjørd ein serstøk líkning, beinanvegin avtøkan er gjørd, ella felagið hevur tikið upp skattfrælst virki.

*Í 50. gr.* verður nú ásett, at skattgjaldari bert skal senda inn sjálvuppgávu til tilhaldskommunu sína, eins og fyribilsskattaskráseting hjá persónum bert skal gerast í tilhaldskommununi. Sjálvuppgávan og fyribilsskattaskrásetingin skal fevna um allar inntøkur skattgjaldarans, bæði tær úr atvinnukommununi og tær úr tilhaldskommununi.

Atvinnukommunan hevur rætt til kommunuskattin av teimum inntøkum, sum stava frá atvinnuni, og *smb. 51. gr.* skal hon eisini hjá persónum álíkna hesa inntøku. Atvinnukommunan hevur tí krav uppá at fáa sendandi alt tilfar, sum snýr seg um atvinnuinntøkuna, frá tilhaldskommununi. Tilfarið skal kannast og inntøkan álíknast í atvinnukommununi, eins og inntøkan verður tikin við á skattalistan har, men eingin uppgerð skal sendast skattgjaldaranum úr atvinnukommununi. Verður broyting gjørd í atvinnuinntøkuni, skal atvinnukommunan boða tilhaldskommununi frá hesum, og verður broytingin síðan innroknað í samanløgdu skattaupphædd skattgjaldarans.

Hjá feløgum eru somu reglur galdandi fyri innsending av sjálvuppgávu, men her skal eins og eftir núgaldandi lóg heimstaðarkommunan standa fyri allari álíkningini, og fær atvinnukommunan síðan kommunuskattin av tí inntøkuni, sum er vunnin í kommununi.

*Í 52. gr.* verður síðan ásett, at persónligir frádráttir, sum ikki hava samband við atvinnuinntøkuna, sum t.d. hall og avskriving av skipspørtum v.m., og sum eftir núverandi lóg bert kunnu verða frádrignir í tilhaldskommununi. Hetta kemur fyri, tá mest sum øll inntøkan vinnukommununi, men tó bert í tann mun, teir ikki rúmast í inntøkuni í tilhaldskommununi. Frádrátturin verður sostatt fyrst og fremst givin í tilhaldskommununi, men um henda inntøka vísir hall, verður nú loyvt at flyta hallið til atvinnukommununa. 2. stk. í 52. gr. er óbroytt frá galdandi lóg, og verða her viðgjørd tey føri, har frádrátturin fyri rentu av eginskuld ikki rúmast í kommunuskattinum í tilhaldskokmmununi. Hetta kemur fyri, tá mest sum øll inntøkan er atvinnuinntøka, og kommunuskatturin tí er fluttur til atvinnukommununa. Nú ber til at flyta rentufrádráttin til atvinnukommununa í tann mun, hann ikki rúmast innan fyri kommunuskattin til tilhaldskommununa.

*Smb. 53. gr.* er atvinnukommununi heimilað at sleppa kravinum um atvinnuskatt, um hon metir, at tann kommunuskattur, ið verður

roknaður av atvinnuinntøkuni, er so lítil, at tað ikki er ómakin vert at krevja hann inn.

## Viðmerkingar til 6. kapittul

Í hesum kapitli verða nærri reglur ásettar um, hvussu skatturin til kommununar og landskassan skal krevjast inn. Tó verður avgjaldið av vinningsbýti kravt inn eftir reglunum í 30. gr. Her skal annars verða víst til tær meira almennu viðmerkingarnar í byrjanini, har sum greitt varð frá muninum millum núverandi innkrevjingarskipan og ta skipan, sum verður skotin upp í hesum lógaruppskoti.

Til tær einstøku greinirnar kunnu annars verða gjørdar hesar viðmerkingar:

*54. gr.* Í galdandi skattalóg eru reglurnar um, hvussu skatturin til landskassan fyri persónar, feløg, deyðsbúgv v.m., sum hava fulla ella avmarkaða skattskyldu her á landi, tiknar við í einum kapitli fyri seg. Nú verður í staðin skotið upp, at reglurnar um skattaútrokning, og hvørjir frádráttir, sum skulu veitast í tí útroknaða skattinum, verða ásettar í serstakari løgtingslóg.

*55. gr.* Tær nýggju innkrevjingarreglurnar verða nýttar til uppkrevjing av bæði lands-, kommunu- og kirkjuskatti, og verða tær nýttar, bæði tá tað snýr seg um skattskyldugar persónar og skattskyldug deyðsbúgv.

*56. gr.* Her verður álagt landsstýrinum at gera nærri reglur um, hvussu sjálv innheintingin av skattinum skal verða løgd til rættis, samstundis sum álagt verður kommununum at útvega innheintingarvaldinum allar tær upplýsingar, sum tað heldur verða neyðugt, fyri at skatturin kann verða kravdur inn eftir reglunum í hesi lóg.

*57. gr.* Inntøkuskatturin skal, alt eftir hvørjum slag av inntøkum hann verður roknaður av, antin verða eftirhildin í inntøkuni við fyribilsgjøldum við hvørja útgjalding sær, ella verða goldin sum fyribilsgjøld sambært skattarokning. Fyribilsskattur, sum verður hildin eftir í inntøkuni sambært 63. gr., verður nevndur A-skattur, og fyribils-

skattur, sum verður goldin sambært skattarokning, verður nevndur B-skattur í hesum lógaruppskoti.

*58. gr.* Henda regla ásetur, at í prinsippinum skal fyribilsskatturin, sum verður kravdur í inntøkuárinum, svara til tann endaliga skattin, sum verður álíknaður, aftaná at álmanakkaárið er lokið. Hetta er galdandi eins væl fyri A- sum B-skatt. Til tess at henda regla kann verða hildin, so langt tað er gjørligt, verður eisini skotið upp, at tá fyribilsskattur verður útroknaður og innkravdur, verður roknað við somu frádráttum, sum hin skattskyldugi kann ætlast at hava í øllum inntøkuárinum, t.e. tá endaliga álíkningin verður gjørd, eins og roynt verður at meta um inntøkuna hjá einum B-skattaborgara so neyvt sum gjørligt, soleiðis at hon kemur at svara til hansara samanløgdu ársinntøku. Í hesum sambandi kann verða víst til 76. gr., sum gevur einum skattaborgara møguleika til at gjalda inn fyribilsskatt aftur at tí, hann hevur goldið í árinum, og til 75. gr., sum gevur skattamyndugleikunum heimild til at gjalda einum skattaborgara pening aftur, um mett verður, at hann hevur goldið ov nógvan fyribilsskatt, eins og møguleiki er fyri at lata vera við at halda aftur skatt í A-inntøkuni, um mett verður, at inntøkan ikki fer upp um eina ávísa upphædd jvmt. 72. gr.

*59. gr.* Her kunnu verða gjørdar tær viðmerkingar, at ein treyt fyri, at kommunurnar kunnu áseta skattaprosentið innan 1. oktober, er, at tær longu í september mánaði hava samtykt eina fíggjarætlan, sum skal galda frá 1. apríl árið eftir. Samstundis sum hetta skattaprosent eisini skal verða galdandi fyri seinasta ársfjórðing av galdandi fíggjarári. Sí í hesum sambandi viðmerkingarnar til 4. kap. um áseting av kommunuskattaprosentinum.

*60. gr.* Tá ið støða skal takast til, hvørjum slag av inntøkum fyribilsskattur skal verða hildin eftir í við hvørja útgjalding sær, og hvørjar inntøkur skattur skal verða kravdur í sambært rokning, eigur at verða hugsað um, at tað skynsamasta er at krevja skattin inn sum A-skatt, so hvørt inntøkan verður útgoldin, tí tá kann fyribilsskatturin altíð verða javnaður soleiðis, at hann kemur at svara til endaligu ársinntøkuna. Verður skatturin haraftur ímóti kravdur inn sambært rokning, og broytist inntøkan, sum er løgd til grund, so hevði tað verið neyðugt at broytt fyribilsskattin gjøgnum árið, um vit í øllum førum skuldu kravt, at fyribils goldin skattur skuldi svarað til endaliga álíknaða skattin. Hetta letur seg tó ikki gera í royndum.

Tá hugsað verður um hetta, eiga reglurnar at verða soleiðis, at fyribilsskattur verður eftirhildin í inntøkuni, har tað gerst uttan óneyðugan ampa fyri skattaborgaran og skattamyndugleikarnar. Tær inntøkur, sum tí skulu roknast sum A-inntøkur, eiga tí at vera slíkar, sum fyri tað mesta verða avroknaðar móttakara sum nettoinntøkur. Teir frádráttir, sum undir slíkum umstøðum verða loyvdir í inntøkuuppgerðini og skattaútrokningini, verða tí vanliga slíkir, sum ikki broytast ár um ár (oftast standardfrádráttir), soleiðis at lagt kann verða upp fyri teir, tá skatturin skal roknast av tí einstøku útgjaldingini.

Henda áskoðan er løgd til grund fyri reglunum í 1. stk. nr. 1-7, tá avgjørt skal verða, um ein inntøka skal roknast sum A-inntøka ella ikki. Reglan skal skiljast soleiðis, at bert tær inntøkur, ið nevndar eru í 1. stk. nr. 1-7, og tær inntøkur, sum sambært 2. stk. eftir nærri reglum frá líkningarráðnum skulu verða roknaðar sum A-inntøkur, koma undir regluna um, at skattur skal eftirhaldast, tá tær verða útgoldnar, meðan allar aðrar inntøkur verða roknaðar sum B-inntøkur. Onnur treyt er eisini, at inntøkan sambært vanligu reglunum í skattalógini kann roknast sum skattskyldug inntøka hjá móttakara, og at móttakarin lýkur treytirnar fyri at verða skattskyldugur her á landi.

*nr. 1.* Reglurnar í nr. 1 eru fyri allar vanligar A-inntøkur, sum eru lagdar inn í peningi fyri »persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur«. Eingin munur er á, um arbeiðið verður gjørt í almennari tænastu ella fyri privatan arbeiðsgevara, eins og eingin munur er á, um arbeiðið verður gjørt í vinnuvirki arbeiðsgevara ella við hús hjá honum.

Inntøkur, sum verða vunnar í sjálvstøðugum vinnuvirki, koma ikki undir hesa reglu. Tílíkar inntøkur hóska ikki til, at skattur verður hildin eftir í teimum, av tí at tær vanliga ikki eru nettoinntøkur hjá móttakara. Av hesari orsøk er tað veruliga ógjørligt at afturhalda í tílíkari inntøku. Inntøka av sjálvstøðugum vinnuvirki verður tí fyribilsskattað og kravd upp við skattarokning.

Vanliga kunnu vit eisini ganga út frá, at ein inntøka, sum gevur rætt til løntakarafrádrátt ella koyrifrádrátt sambært 33. gr. 7) og 8), eisini skal verða roknað sum A-inntøka, og eisini umvent, har vit ikki geva loyvi til løntakarafrádrátt, kunnu vit heldur ikki vanliga rokna inntøkuna til A-inntøku.

Í flestum førum verður tað neyvan trupult at gera av, um tað er »persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur«, sum eftir hesum reglum treytar, at ein inntøka verður roknað sum A-inntøka, um hin skattskyldugi ger arbeiði, sum arbeiðsgevarin áleggur honum og fyri arbeiðsgevarans rokning. Øvugt ber oftast til at gera av, nær eitt arbeiði fellur uttan fyri hesar reglur, tí tá snýr tað seg oftast um sjálvstøðugt vinnuvirki. Men uttan iva fer tað í mongum førum at koma fyri, at tað verður trupult at gera av, um ein inntøka er vunnin í »persónligum arbeiði í tænastu fyri onnur« ella ikki. Eitt, sum í hesum viðfangi kann fáa týdning, er t.d., at sum inntøka av sjálvstøðugum vinnuvirki kann verða roknað inntøka, sum sjálvstøðugur vinnurekandi hevur av, at hann hevur sett seg niður í egnum høli, t.d. í handli, verkstaði, skrivstovu, heilsubótarstovu, teknistovu v.m., og arbeiðið heilt ella lutvíst verður gjørt í hesum hølum.

Eisini kann verða lagt sum grund fyri avgerðini, um tað snýr seg um ein sjálvstøðugan vinnurekandi, um hann við lýsing, skelti e.l. týðiliga vísir, at hann/hon er yrkisfólk á ávísum øki, sum tekur á seg arbeiði av ávísum slag. Onnur dømi kunnu verða nevnd her, sum kunnu tala fyri, at tað snýr seg um ein sjálvstøðugan vinnurekandi, t.d. um hann:

hevur rætt til at taka persónar í læru ella yvirhøvur tekur sær hjálparfólk,

leggur til rættis, býtir sundur og hevur eftirlit við arbeiðinum uttan aðra leiðbeining frá arbeiðsgevara enn møguliga at hava fingið eina tekning v.m. yvir, hvussu arbeiðið skal gerast,

heilt ella lutvíst letur tilfarið til arbeiðið,

hevur fíggjarligu ábyrgdina av, at arbeiðið verður gjørt,

hevur avmarkaða ábyrgd til umbidna arbeiðið,

hóast umbidna arbeiðið ikki er frágjørdur frá at taka á seg annað arbeiði,

fær samsýning útgoldna eftir rokning, og at alt ikki verður goldið, fyrr enn arbeiðið er gjørt sum avtalað og møgulig brek rættað,

krevur serstaka góðkenning, loyvi o.l., og at hann hevur hesi loyvi.

Harafturímóti verður sum stuðul fyri, nær tað snýr seg um »persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur«, t.d. nýtt, at inntøkumóttakarin bert hevur ein og sama arbeiðsgevara,

at hann hevur gjørt avtalu um framhaldandi arbeiði,

at inntøkumóttakarin verður at rokna sum løntakari, ið hevur rætt til frítíðarløn eftir frítíðarlógini,

at hann er settur í starv eftir starvsmannalógini ella kemur undir

lógina um arbeiðaravernd,
at inntøkan er nettoinntøka hjá honum,
at inntøkan er roknað sum løn fyri vanliga tænastu, t.d. sum tímaløn, vikuløn, mánaðarløn, ómaksløn, akkordløn v.m.

Ein onnur treyt fyri at nýta hesar reglur er, at samsýningin verður latin í peningi. Samsýning sum fríur ágóði kemur ikki undir A-inntøku. Men harafturímóti hevur tað ongan týdning, í hvørjum líki lønin verður latin, tí upp í A-inntøku verður roknað samsýning í peningi, ið verður latin fyri »persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur« uttan mun til, um hon er føst løn, tímaløn, akkordløn, tantieme, ómaksløn ella gjald. Heldur ikki hevur tað týdning, um tað snýr seg um ein høvuðspartaeigara í einum felag, ella tað snýr seg um ein stjóra ella annan persón, sum hevur oddastarv í eini fyritøku og tí hevur fólk undir sær, eins og tað heldur ongan týdning hevur, um talan er um høvuðsvinnu ella hjávinnu.

Verður lønin goldin sum fríur ágóði, t.d. sum frítt uppihald ella sum fríur kostur o.t., so verður hetta roknað sum B-inntøka. Hevur hin skattskyldugi eisini A-inntøku, so kann peningsvirðið av slíkum fríum ágóðum mótroknast í møguligum frádráttum og soleiðis verða tikin við sum A-skattur beinanveg. Upphæddir, sum verða útgoldnar sum endurgjald fyri ferðing og annars til meirútreiðslur í hesum sambandi av einum arbeiðsgevara til ein løntakara, verða hvørki roknaðar sum A- ella B-inntøkur.

Reglurnar í 1. stk. nr. 2-7 fevna um veitingar, sum eins og lønarinntøka fyri tað mesta eru nettoinntøka hjá móttakara ella inntøkusløg, sum eyðkenniliga hava samband við fyrrverandi tænastuviðurskiftini hjá persóninum. Her verður hugsað um inntøkur, eitt nú sum samsýning sum limur av ella sum hjálp hjá stjórn, nevnd, umboð, ráð o.ø. eins og pensjón, bíðipeningur, arbeiðsloysisstudningur v.m.

*Í 2. stk.* verður ásett, at inntøkur, sum vanliga ikki verða roknaðar at verða A-inntøkur eftir 1. stk., eftir fyriskipan líkningarráðsins kunnu roknast sum A-inntøkur. Her verður hugsað um t.d. søluprovisiónir og samsýningar, sum útgoldnar verða fyri sjálvstøðugt arbeiði, og har lønin er nettoinntøka hjá móttakara t.d. hjá sýns- og metingarmonnum og fyri líknandi arbeiði.

Víðari verður í *2. petti í 2. stk.* ásett, at líkningarráðið kann gera av, at eisini avreiðing av fiski v.m. verður at rokna sum A-inntøka. Her

verður í fyrsta lagi hugsað um bátar, sum trupult kann verða at fáa skattin inn frá, og sum avreiða til flakavirki og aðrar fiskakeyparar.

Flakavirkið ávísir tá bruttoupphæddina gjøgnum afturhaldsskipanina, og í henni kann so ein minni upphædd verða eftirhildin, sum svarar til skattin hjá bátseigaranum. Eisini kann hugsast, at bátseigarin ikki avroknar manningarpartarnar gjøgnum afturhaldsskipanina, og tí gerst neyðugt at krevja skattin inn hjá manningini eisini við at lata flakavirkini ávísa alla bruttoupphæddina gjøgnum afturhaldsskipanina. A-skattur hjá manningini verður tá afturhildin, men bátsparturin kann møguliga óskerdur verða útgoldin eigaranum/bátsformanninum. Útgjaldingar frá Lønjavningargrunninum verða tá viðgjørdar á sama hátt.

Nærri fyriskipanir um hetta kunnu verða gjørdar av líkningarráðnum við kunngerð.

*61. gr.* Her verður hugsað um lønarinntøkur frá útlendskum arbeiðsgevarum, sum ikki eru ávísingarskyldugir í Føroyum, eitt nú h ra við útlendskum bátum og inntøka í Grønlandi, sum verður ' uttað í Føroyum. Hesar inntøkur verða útgoldnar sum higartil, uttan at skattur verður eftirhildin. Móttakarin av hesi inntøku verður sostatt roknaður sum B-skattaborgari, og verður hann forskotsskrásettur við einum mettum fyribilstali, sum hann rindar skatt av smb. rokning, sí gr. 71.

Her skal tó nevnast, at um tann útlendski arbeiðsgevarin hevur fulltrúa fyri seg, sum hevur heimating her á landi, verður hesin seinni skyldugur at ávísa inntøkurnar gjøgnum afturhaldsskipanina, sí her gr. 63, 1. stk.

*62. gr.* Í hesi grein verður ásett, at líkningarráðið kann gera av, at inntøka, sum vanliga hevði verið at rokna sum A-inntøka eftir 60. gr., ikki skal vera tað. Líkningarráðið fær her heimild at gera av, at inntøka, sum vanliga hevði verið A-inntøka, og sum tískil skuldi verið útgoldin gjøgnum afturhaldsskipanina, í førum, har hetta vil vera óvanliga trupult, ístaðin verður at rokna sum B-inntøka, sum útgoldin kann vera, uttan at eftirhildið verður. Líkningarráðið ger nágreiniliga reglugerð hesum viðvíkjandi.

Í 2. stk. verður ásett, at líkningarráðið í ivamálum ger av, um inntøka er A- ella B-inntøka. Um hesa avgerð kann kærast til Føroya Landsstýri.

*63. gr.* Í hesi grein verða ásettar reglurnar fyri afturhaldsskipanina,

og virkar hon í høvuðsheitunum soleiðis, at arbeiðsgevari, sum skal útgjalda løn, letur avrokningarstaðnum lista yvir teir persónar, ið løn skulu hava, við upplýsingum um persónsnummar, navn, bruttoupphædd hjá hvørjum lønmóttakara sær og møguliga kontonummar hansara umframt egið navn og arbeiðsgevaranummar. Samstundis rindar hann avrokningarstaðnum upphædd svarandi til samanløgdu lønarupphæddina.

Avrokningarstaðið gevur dátu-skránni hjá skattavaldinum hesar upplýsingar á on-line skermi, tape, diskettu e.l.

Dátu-skráin viðger hesar upplýsingar í egnari dátukoyring, sum er stongd fyri avrokningarstaðnum, har fyribilsskattur fyri hvønn løntakara sær verður útroknaður. Í hesi dátu-viðgerð verður samanlagda skattaupphæddin ávíst til konto landskassans. Tær einstøku nettolønirnar eru nú greiðar til útgjaldingar á tann hátt, sum arbeiðsgevarin hevur ávíst, antin á konto hjá løntakaranum ella aftur til arbeiðsgevara, sum so rindar løntakaranum peningin í hondina.

Tá lønarupphæddirnar verða ávístar til kontonummarið hjá hvørjum løntakara sær, verður á hesa konto bókað bruttoløn og skattur í tveimum upphæddum, so móttakarin á kontoavriti/bankabók kann fylgja hvørji lønarútgjalding og tí eftirhildna skattinum.

Um øll tann samanlagda nettolønin skal ávísast aftur til arbeiðsgevaran/konto hansara, má dátu-skipanin harumframt skriva ein lista út til arbeiðsgevaran við upplýsingum um bruttoløn, hvussu nógv er eftirhildið, og hvussu nógv skal gjaldast hvørjum løntakara sær. Eisini skal skipanin skriva eitt eintak til løntakaran við somu upplýsingum.

Soleiðis sum skipanin er uppbygd, verða lønarupphæddir, sum ávístar eru til gjaldingar ein dag, í fyrsta lagi greiðar til útgjaldingar næsta dag, og er í sáttmálanum við peningarstovnarnar ásett, at hetta millumbil í mesta lagi kann vera 2 arbeiðsdagar.

Um løntakari ynskir løn sína útgoldna beinanvegin, kann tað tó verða gjørt, við at arbeiðsgevarin letur honum ein »lønarkekk«, sum kann verða útloystur beinanvegin í øllum peningastovnum, men verður tá eftirhildið við tí hægstloyvda %-tali í lógini.

Sum høvuðslykil til skattaskránna verður nýtt tað persónsnummarið, sum øll, ið búgva í Føroyum, fáa. Teir persónar, sum dvølja her stutta tíð og tískil ikki verða skrásettir í fólkayvirlitinum, fáa einki persónsnummar. Um teir fáa inntøku av einhvørjum slag, kunnu teir ikki fáa hana útgoldna gjøgnum afturhaldsskipanina, uttan at teir fyrst hava vent sær til skattavaldið á staðnum, ið letur teimum eitt serstakt n[illegible]arprógv, sum arbeiðsgevarin skal nýta í

lønarávísing síni.

Í lógini er her ásett, at mótkrav ikki kann gerast í tí eftirhildna skattinum, hvørki av arbeiðsgevara ella peningastovni. Harumframt verður í sáttmálanum millum Føroya landsstýri og peningastovnarnar avtalað, at peningastovnarnir heldur ikki kunnu seta mótkrøv í nettolønina.

*64. gr.* Í hesi grein verður ásett, at vanliga má ikki eftirhaldast meir enn 50% av eini A-inntøku, sum útgoldin verður gjøgnum skipanina. Tó verður henda %-upphædd hækkað til 55, tá skattgjaldarin hevur fingið írestandi skatt fluttan frá seinastu álíkning til innkrevjingar saman við tí nýggja skattinum. Eisini verður her víst til 136. gr., 2. stk., har hægst loyvda % er ásett til 65, tá skattgjaldarin er í eftirstøðu við skatti, sum stavar frá tíðini, áðrenn henda lóg verður sett í gildi.

*65. gr.* Her verður víst til viðmerkingarnar til 61. gr., síðsta punktum.

*66. gr.* Henda grein gevur landsstýrinum heimild til at samráðast við ríkisstjórnina um, at lønarupphæddir, sum verða útgoldnar persónum, sum eru undir fullari ella avmarkaðari skattskyldu í Føroyum, av arbeiðsgevara, sum hevur heimating í Danmark, og sum sostatt smb. 61. gr. b) ikki verða roknaðar sum A-inntøkur, kortini skulu koma undir eina afturhaldsskipan, og at hesin afturhildni peningurin skal avroknast við Føroyar.

*67. gr. - 76. gr.* Smb. hesum greinum verður stovnað ein skattaskrá, sum verður grundarlag undir allari álíkning. Í fyrstu syftu verða í fyribilsskattaskrásetingini allir teir persónar, sum eru skattskyldugir í hvørji kommunu sær, skrásettir, og verða allar tær upplýsingar skrásettar, sum hava týdning, tá skatturin verður útroknaður, so sum rentufrádráttur, barnatal, hjúnabandsstøða o.a.

Tær upplýsingar, sum skrásettar eru í fyribilsskattaskrásetingini kunnu tó verða broyttar í inntøkuárinum, um so er, at inntøka ella frádráttir broytast munandi, bæði tá skattgjaldarin ynskir tað, og tá skattavaldið metir hetta at vera neyðugt.

Fyriskipanin í 72. gr. kann sammetast við fríkortskipanina í donsku og norsku skattaskipanini, og sum dømi kann nevnast skúlaungdómur, sum í frítíðini vinnur sær nakað av peningi, men sum ársupphæddin hjá er minni enn allur skattligi frádrátturin. Hesi kunnu við at

lata inn spurnarblað fáa upplýst, hvussu nógv tey kunnu vinna árliga uttan at rinda skatt.

Fyribils B-skatturin verður at gjalda smb. rokning í 12 gjøldum, sum falla til gjaldingar hvønn tann 1. við vanligari gjaldsfreist.

Skattavaldinum er heimilað at gjalda út av fyribils inngoldnum upphæddum, um mett verður, at endaligi ársskatturin verður munandi lægri enn tað, ið longu er inngoldið.

Um skattgjaldari í inntøkuárinum varnast, at hann hevur goldið ov lítlan skatt eftir fyribilsskrásetingini í mun til tað, hann metir endaliga skattin at verða, er møguligt hjá honum at gjalda inn eyka fyribilsskatt. Varnast hann hetta, tá inntøkuárið er at enda, hevur hann møguleika fram til 31. mars at inngjalda ein møguligan frestandi skatt og soleiðis sleppa undan tí eykagjaldi upp á 12%, ið ásett er í 78. gr., 2. stk.

*77. gr.* Í hesi grein verður ásett, hvussu endaligi skatturin verður mótroknaður teimum fyribils inngoldnu upphæddunum. Tá inntøkuárið er at enda, verður innlatin sjálvuppgáva av øllum inntøkum og útreiðslum, og verður tá ein endaligur skattur útroknaður. Her verða mótroknaðar tær upphæddir, sum inngoldnar eru sum fyribilsskattur bæði gjøgnum afturhaldsskipanina og smb. útskrivaðari skattarokning. Harumframt verða mótroknaðar tær upphæddir, sum av eintingum eru inngoldnar smb. 76. gr., eins og tær upphæddir, sum goldnar eru smb. 130. gr., meðan tað, sum útgoldið er smb. 75. gr., verður lagt afturat.

*78. gr.* Um tann endaligi skatturin er hægri enn tær fyribils inngoldnu upphæddirnar smb. uppgerðina í 77. gr., verður hesin munur nevndur »frestandi skattur«, og afturat hesum verður goldið eitt eykagjald uppá 12%.

Í hesi grein verða ásettar reglurnar fyri gjalding av frestandi skatti.

*1.* Er frestandi skatturin íroknað eykagjald v.m. minni enn 5.000 kr., og er endaliga álíkningin útskrivað innan 1. oktober í álíkningarárinum, verður hann at gjalda saman við næsta árs A- og B-skatti; hjá A-skattgjaldaranum við at leggja eitt eykaprosent í afturhaldsskipanina, og hjá B-skattaborgaranum við at tann frestandi skatturin verður roknaður upp í næsta árs fyribilsskatt og verður útskrivaður saman við hesum skattarokningunum.

*2.* Allur annar frestandi skattur enn tann, sum nevndur er undir 1, verður uppkravdur við rokning á henda hátt:

a) Frestandi skattur við íroknaðum eykagjaldi v.m. størri enn

5.000 kr. og útskrivaður fyri 1. oktober eins og allur írestandi skattur útskrivaður millum 1. oktober og 1. januar verður býttur í 3 gjøld, og falla tey til gjaldingar 1. januar, 1. februar og 1. mars við sonu gjaldsfreistum sum fyribils B-skatturin í inntøkuárinum.

b) Allur írestandi skattur, tá endaliga álíkningin er útskrivað eftir 1. januar, verður býttur í 3 gjøld eins og undir a), og falla tey til gjaldingar hvønn tann 1. í teimum 3 eftirfylgjandi mánaðunum.

Harumframt verður í hesi grein ásett, á hvønn hátt írestandi skattur v.m. verður uppkravdur hjá persónum, sum skattskyldan er burturfallin hjá, tá næsta inntøkuárið byrjar, antin vegna burturflyting ella andlát.

Hjá persóni, har inntøkan við byrjan av næsta inntøkuári er burturfallin, verður tann írestandi skatturin kravdur inn smb. omanfyristandandi reglum fyri innkrevjing av frestandi skatti, sum útskrivaður er aftan á 1. oktober.

Viðv. innkrevjing av eftirstøðum verður víst til 136. gr.

*79. gr.* Um tann endaligi skatturin er lægri enn tær fyribils inngoldnu upphæddirnar smb. uppgerðini í 77. gr., verður hesin munur nevndur »avlopsskattur«, og verður hann, um hann er større enn 25 kr., afturgoldin skattgjaldaranum við einum eykagjaldi upp á 12% afturatløgdum.

Um avlopsskatturin stavar frá teirri sjálvbodnu inngjalding, sum nevnd er í 76. gr., verður ikki latið eykagjald av hesum upphæddum, eins og eykagjald heldur ikki verður latið av upphæddum oman fyri 100.000 kr.

Afturgjaldingin fer fram í tíðini frá 1. oktober til 1. desember í álíkningarárinum. Verður avlopsskatturin ikki útgoldin fyrr enn aftan á 1. desember, ber hann rentu við 1% fyri hvønn mánað frá nevnda 1. desember.

*80. gr.* Um endaliga álíkningin fyri ávíst inntøkuár seinni verður broytt, og lougu útroknaður írestandi skattur ella avlopsskattur sostatt verður broyttur, verður hesin munur við teimum ískoytum og rentum, ið ásett eru í hesi grein, afturatløgdum ella frádrignum, javnaður eftir somu reglum sum fyri írestandi skatt og avlopsskatt, og er harafturat ásett, at afturgjalding smb. hesi grein skal verða gjørd, innan mánaðurin, sum kemur aftan á broytingardagin, er úti.

*81. gr.* Í hesi grein verður ásett, at partafeløg og tey feløg v.m., sum nevnd eru í 1. gr. nr. 7-14, skulu rinda skattin fyri tað inntøkuár, sum

fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum undan álíkningarárinum, í álíkningarárinum í trimum gjøldum, tann 1. oktober, 1. november og 1. desember við vanligari gjaldsfreist til 20. í gjaldsmánaðinum.

Um hesin skattur, orsakað av eini broyting í álíkningini, verður hækkaður, fellur hækkingin til gjaldingar tann 1. í mánaðinum aftaná, at rokning er útsend við vanligari gjaldsfreist. Verður gjaldsfreistin ikki hildin, verður renta roknað við 1% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum. Í hesum sambandi verður eisini víst til 142. gr., 1. stk. Um broytingin í álíkningini hevur við sær, at skatturin verður lækkaður, skal ov nógv inngoldni skatturin gjaldast aftur innan 20. í mánaðinum aftaná, at broytingin er útsend. Ov nógv goldni skatturin ber rentu við 1% fyri hvønn byrjaðan mánað frá inngjaldingardegnum at rokna.

*82. gr.* Í hesi grein verður ásett, at skattgjaldari altíð kann biðja um eitt avrit, sum fyri farna part av árinum vísir, hvussu stór tann inntøka er, sum goldin er honum um afturhaldsskipanina, og hvussu nógv er eftirhildið í henni.

*83. gr.* Í hesi grein verður greitt frá, hvussu inngoldin kommunu- og kirkjuskattur verður avroknaður hvørji kommunu sær.

Allur lands-, kommunu- og kirkjuskattur verður inngoldin á konto landskassans. Landskassin rindar innan tann 20. í hvørjum mánaði hvørji kommunu sær eina upphædd, sum svarar til hennara part av teimum inngoldnu fyribilsskattunum í mánaðinum frammanundan. Hetta verður gjørt fyri hvønn mánað í árinum. Seinasta fyribilsavrokning fyri eitt ávíst inntøkuár verður sostatt goldin kommununi stutt eftir árslok, innan 20. januar. Tann næsta avrokningin til kommununa verður tá fyri næsta inntøkuár.

Dømi: Inntøkuárið 1986. — Fyribilsskattaskrásetingin í kommununi vísir ein samanlagdan fyribils álíknaðan skatt upp á 3.000.000 kr., og verður hetta tal nýtt, tá kommunan ger fíggjarætlan sína og ásetur kommunuskattaprosentið.

Avrokningin til kommununa kann koma at síggja soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Januar | avrokningin ..... | 215.000 kr. |
| Februar | — ..... | 205.000 — |
| Mars | — ..... | 200.000 — |
| Apríl | — ..... | 180.000 — |
| Mai | — ..... | 250.000 — |
| Juni | — ..... | 280.000 — |
| Juli | — ..... | 300.000 — |
| August | — ..... | 290.000 — |
| September | — ..... | 300.000 — |
| Oktober | — ..... | 250.000 — |
| November | — ..... | 250.000 — |
| Desember | — ..... | 260.000 — |
| Útgoldið tilsamans ..... | | **2.980.000 —** |

Fyribils avrokningarnar til kommununa fyri inntøkuárið 1986 halda nú uppat, og í staðin fær kommunan avroknað fyribilsskatt fyri inntøkuárið 1987 á sama hátt sum fyri 1986.

Upphæddir fyri inntøkuárið 1986, sum vegna ov seint inngoldnan B-skatt, frestandi skatt v.m. eru inngoldnar aftan á 1. januar 1987 verða goymdar og avroknaðar kommununi beint aftan á endaligu álíkningina.

Endaliga álíkningin fyri inntøkuárið 1986 verður gjørd 1. oktober 1987.

Endaliga álíkningin í kommununi í frammanfyri nevnda dømi verður t.d. henda:

| | |
|---|---|
| Samanlagdur kommunu- og kirkjuskattur ..... | 3.250.000 kr. |
| Inngoldið pr. 1. oktober 1987 ..... | 3.100.000 — |
| Eftirstøða ..... | **150.000 —** |

Um hesa endaligu álíkning fær kommunan fráboðan beint aftan á 1. november 1987.

Samstundis fær kommunan eina uppgerð, sum vísir, hvussu nógv er avroknað kommununi higartil, og um hon eigur nakað til góða ella hevur fingið ov nógv útgoldið, t.d. soleiðis:

| | |
|---|---|
| Inngoldið tilsamans ..... | 3.100.000 kr. |
| Fyribils avroknað kommununi tilsamans ..... | 2.980.000 — |
| Ágóði kommununnar ..... | **120.000 —** |

Hesin ágóði er ikki størri enn 5% av allari fyribilsupphæddini, 2.980.000 kr., sum kommunan hevur fingið útgoldna í inntøkuárinum 1986, og verður hann tí útgoldin kommununi í einum beinanvegin eftir 1. november 1987.

Um tann samanlagda avroknaða fyribilsupphæddin í staðin hevði verið 2.750.000 kr., og hini tølini annars høvdu verið tey somu, hevði uppgerðin sæð soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Inngoldið tilsamans ..... | 3.100.000 kr. |
| Fyribils avroknað kommununi tilsamans ..... | 2.750.000 — |
| Ágóði kommununnar ..... | **350.000 —** |

Hesin ágóði er størri enn 5% av samanløgdu fyribilsupphæddini, 2.750.000 kr., og verður tí í november útgoldið 5% av 2.750.000 kr. = 137.500 kr., meðan tað, sum eftir er, við einum ískoyti upp á 8% verður goldið kommununi saman við teimum mánaðarligu fyribilsupphæddunum í 12 líka stórum gjøldum.

Um nú tann samanlagda avroknaða fyribilsupphæddin í staðin hevði verið 3.300.000 kr., og hini tølini annars vóru tey somu, hevði uppgerðin sæð soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Inngoldið tilsamans frá skattaborgarunum ..... | 3.100.000 kr. |
| Fyribils avroknað kommununi tilsamans ..... | 3.300.000 — |
| Ágóði landskassans ..... | **200.000 —** |

Henda upphædd uttan ískoyti verður mótroknað í teimum mánaðarligu fyribilsupphæddunum í 12 líka stórum gjøldum.

Árið eftir í oktober 1988 verður endaliga álíkningin fyri inntøkuárið 1987 gjørd. Harumframt verður uppgerð gjørd yvir tær broytingar, sum gjørdar eru í álíkningini fyri 1986, yvirlit yvir tær

upphæddir, sum inngoldnar eru av eftirstøðum frá hesum ári, og yvir upphæddir, sum vegna hækkan og lækkan í skattskyldugu inntøkuni eru inn- og útgoldnar. Uppgerðiu kann tá koma at síggja soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Endalig álíkning 1987 ..... | 3.650.000 kr. | |
| Inngoldið frá skattaborgarunum . | ÷ 3.200.000 — | + 3.200.000. kr. |
| Útistandandi inntøkuárið 1987 ... | 450.000 — | |
| Endalig álíkning 1986 ..... | 3.250.000 — | |
| Broytingar síðan síðstu uppgerð .. | + 350.000 — | |
| Nýggj endalig álíkning 1986 ..... | 3.600.000 — | |
| Inngoldið frá skattaborgarunum . | ÷ 3.400.000 — | + 3.400.000 kr. |
| Útistandandi inntøkuárið 1986 ... | 200.000 — | |
| Samanlagt útistandandi ..... | 650.000 — | |
| Fyribils avroknað 1987-álíkning .. | | ÷ 3.400.000 kr. |
| Fyribils avroknað 1986-álíkning .. | | — 3.100.000 — |
| At gjalda kommununi í einum 1. nov. 1988 ..... | | **100.000 —** |

Samanumtikið kann sigast, at hesin avrokningarháttur hevur til endamáls at avrokna tær inngoldnu skattaupphæddirnar leypandi í inntøkuárinum, meðan tær upphæddirnar, sum inngoldnar verða, aftaná at inntøkuárið er farið, ikki verða avroknaðar kommununi, fyrr enn aftaná at endaliga líkningin er gjørd í oktober mánaði.

Í mun til núverandi skattaskipan má havast í huga, at tær skattaupphæddirnar, sum inngoldnar verða í inntøkuárinum, eru fyribilsupphæddir. Tann endaligi skatturin kann bæði gerast størri og minni, t.e. at skattaborgararnir antin fáa frestandi skatt ella avlopsskatt. Tann frestandi skatturin verður innkravdur, sum frágreitt varð í 78. gr., og verður hann tí í fyrsta lagi inngoldin til landskassan árið eftir álíkningarárið, meðan avlopsskatturin sum frágreitt í 79. gr. skal afturgjaldast skattaborgarunum at siga beinanvegin.

Við tað endaligu álíkningina kemur landskassin tíðkil í ta støðu, at hann skal gjalda aftur upphæddir til teir skattaborgarar, sum hava fingið avlopsskatt, og kann hetta samanlagt verða stórar upphæddir,

tá allar kelduskattaskipanir leggja seg eftir, at tann inngoldni fyribilsskatturin er í hægra lagi.

Landskassin má tí skipa so fyri, at tann peningur, sum skal afturrindast borgarunum, er tøkur, tá tann endaliga álíkningin er liðug. Hetta snýr seg tá um bæði lands-, kommunu- og kirkjuskatt. Um landskassin avroknar allar inngoldnar upphæddir beinanvegin, kunnu tær upphæddir, sum kommunan verður kravd at gjalda aftur til landskassan vegna henda avlopsskattin, og sum tískil sum ásett í 83. gr. skulu mótroknast í teimum mánaðarligu fyribilsupphæddunum, gerast so stórar, at kommunurnar koma í fíggjarligar trupulleikar.

Í hesi lóg er tí skipað soleiðis fyri, at bert tær upphæddir, sum inngoldnar verða leypandi í inntøkuárinum av fyribilsskatti, verða avroknaðar beinanvegin, meðan allar seinni inngjaldingar vegna ov seint goldnan skatt, frestandi skatt, hækkanir o.s.fr. verða samansavnaðar í landskassanum og uppgjørdar hvønn 1. oktober. Tann útgoldni avlopsskatturin verður mótroknaður í hesi uppgerð, og avlopið verður síðani avroknað ella mótroknað kommununum eftir reglunum í 83. gr.

Í teimum førum, tá landskassin hevur ligið inni við peningi, sum kommunan eigur, verður góðskrivað henni ein renta upp á 8%, meðan kommunan ikki verður kravd eftir rentu, tá hon hevur fingið ov nógv útgoldið smb. nevndu uppgerð.

## Viðmerkingar til 7. kapittul

Sambært løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar verður ásett í 45. gr., at bygda(r)ráðið velur eina líkningarnevnd, sum sjálvstøðugt tekur sær av álíkningini. Talið á nevndarlimum verður ásett í teirri reglugerð, sum henda lóg áleggur kommununum at gera, og skal hetta tal verða stakt.

*84. gr.* Í hesi grein verður álagt bygda(r)ráðnum at skipa fyri skattaálíkningini í kommununi. Til hetta kunnu tær velja eina líkningarnevnd, sum sjálvstøðugt skal taka sær av skattingini í kommununi. Talið á nevndarlimum skal vera stakt. Minst 3 og hægst 5 kunnu veljast, og fyri hvønn av hesum verða eisini valdir tiltakslimir, sum kunnu innkallast, um tí fasta liminum berst frá.

Henda grein hevur við sær, at neyðugt er at strika 45. gr. í kommunulógini, tá annars bæði kommunulógin og skattalógin høvdu havt reglur um val av líkningarnevndum.

*84. gr.* sigur annars bert, at líkningarnevndir kunnu veljast. Landsstýrið kemur í kunngerð at áseta, hvussu nógvar íbúgvar ein kommuna skal hava, tá álagt skal verða henni at velja eina líkningarnevnd, Hugsað kundi verið um, at álagt verður sum higartil øllum kommunum við meira enn 1.000 íbúgvum at velja líkningarnevnd, soleiðis at skilja, at tær kommunur, sum hava færri íbúgvar, sjálvar kunnu gera av, um tær velja eina líkningarnevnd til at taka sær av álíkningini, ella at bygda(r)ráðið sjálvt velur at taka sær av henni.

2. stk. fyriskipar, at har líkningarnevnd verður vald, skal hon veljast fyri alt valskeiðið. Hetta forðar tó ikki eini kommunu við færri enn 1.000 íbúgvum mitt í einum valskeiði at viðtaka at velja eina líkningarnevnd, sum skal sita tað, sum eftir er av valskeiðnum hjá bygda(r)ráðnum. Henda nevnd skipar seg tá eftir reglunum í hesi lóg.

Nývalda líkningarnevndin heldur so skjótt sum gjørligt, aftaná at hon er vald, sín fyrsta fund. Tann limur, sum hevur verið longst limur í nevndini, ella, um fleiri hava verið lika leingi, so tann elsti, kallar inn til fyrsta fundin. Á hesum fundi velur nevndin formann og næstformann fyri alt valskeiðið. Valið fer fram eftir teirri starvsskipan, sum landsstýrið ger sambært 10. stk. í hesi grein.

Í 3. stk. verður álagt bygda(r)ráðnum at velja nýggjan lim, um ein limur sigur seg úr nevndini. Tiltakslimur hansara kann ikki verða innkallaður, uttan so at hann av bygda(r)ráðnum verður valdur til fastan lim, og skal tá ein nýggjur tiltakslimur veljast. Tiltakslimur kann bert verða innkallaður, um fasta limirnum berst frá at møta.

Í tí starvsskipan, sum landsstýrið ger sambært 10. stk., verða fastar reglur gjørdar fyri, nær tiltakslimur kann verða innkallaður. Í slíkari starvsskipan eigur at standa, at um tann fasti limurin krevur tað, so skal tiltakslimurin innkallast, og skal hann innkallast, um fasti limurin verður burtur í minsta lagi 1 mánað.

Sambært 4. stk. er nevndin viðtøkufør, tá minst helmingurin av limunum eru á fundi, og skal ein avgerð fyri at hava gildi viðtakast av minst helminginum av teimum, ið eru á fundi. Formaðurin ella í hansara stað næstformaðurin skulu luttaka í øllum avgerðum. Um

tað stendur á jøvnum millum atkvøðurnar um eitt uppskot, er atkvøða formansins, ella í hansara stað næstformansins, avgerandi.

*6. og 7. stk.* seta reglur fyri, nær ein limur ikki kann taka lut í eini avgerð í líkningarnevndarfundi. Somu reglur galda eisini fyri ommur vald í hesi lóg, sum t.d. líkningarráðið og landsskattanevndina. Ein limur skal sjálvur siga frá, um hann er í iva, um hann kann luttaka í eini avgerð. Líkningarnevndin tekur tá avgerð, um hann hevur slíkan áhuga í málinum, sum er til viðgerðar, at hann kann metast ikki at vera luttøkuførur sambært 6. stk. í hesi grein. Um so er, skal hann bæði við viðgerðina og atkvøðuna um málið fara av fundinum, harafturmóti kann hann luttaka í bæði viðgerðini og atkvøðugreiðsluni í nevndini, tá spurningurin verður viðgjørdur, um hann skal fara av fundinum ella ikki, velur hann ikki at fara sjálvur.

Í 8. og 9. stk. verður møguleiki givin fyri, at bygda(r)ráðið við loyvi landsstýrisins kann veita formanninum og limunum samsýning.

10. stk. áleggur landsstýrinum at gera eina starvsskipan, sum líkningarnevndirnar skulu arbeiða eftir. Slík starvsskipan má verða soleiðis háttað, at hon eisini kann nýtast í sambandi við tær deildarskrivstovur, sum umrøddar eru í 85. gr.

*85. gr.*
Samsvarandi samtykt Føroya løgtings í løgtingsmáli nr. 42/1982 er her skotið upp, at fyrisitingarskrivstovur fyri størri øki verða settar á stovn til m.a. tað endamál, sum nevnt er í hesi grein, nevniliga at taka sær av sjálvari fyrisitingini í sambandi við líkningina, sum bygda(r)ráð og líkningarnevndir, eins og undir núgaldandi skattaskipan, skulu hava um hendur.

Fyrisitingarskrivstovurnar skulu mannast við fólki frá líkningarráðnum, soleiðis at tær formliga verða deildarskrivstovur hjá hesum stovni.

Landsstýrið skal fyriskipa nærri reglur fyri arbeiðsgongd og starvsskipan í sambandi við virksemi hjá deildarskrivstovunum og samstarvið við kommunulíkningarvaldini.

*86. gr. og 87. gr.* Her snýr tað seg um, hvussu farið skal verða fram, tá líkningarvaldið á staðnum ikki hevur farið eftir sjálvuppgávuni hjá

skattgjaldara, og um møguleikarnar hjá hesum at kæra um eina avgerð, sum er tikin av skattavaldinum. Ongar munandi broytingar eru gjørdar í hesum reglum frá galdandi lóg. Einasta broyting av týdningi er, at í 86. gr. 2. stk. verður loyvt líkningarvaldinum á staðnum at lata kommunuskattafyrisitingina gera álíkningar teirra vegna, og kunnu slíkar avgerðir tiknar av fyrisitingini av einum skattaborgara verða kærdar til líkningarnevndina. Sambært gr. 84, 10. stk. ger landsstýrið nærri reglur fyri, hvussu ein slík starvsskipan roynist í verki. Eisini skal verða nevnt, at tá skattaborgari hevur latið inn sjálvuppgávu rættstundis, skal líkningarvaldið, um tað ikki kann góðtaka sjálvuppgávuna, antin biðja hann koma á fund við seg ella geva honum møguleika til skrivliga at veita greiniligar upplýsingar ella sannanir. Líkningarvaldið skal annars altíð skrivliga gera ein skattaborgara kunnugan við eina broyting í sjálvuppgivnu inntøku hansara, orsøkina til broytingina og møgulcikan hjá honum at kæra um broytingina. Slík kæra frá einum skattaborgara skal vera skrivlig, og skal grundgeving fyri kæruni verða við, bæði um hann kærir til kommunulíkningarvaldið, ella um hann kærir til landsskattanevndina. Kæra skal verða móttikin av líkningrvaldinum, áðrenn 4 vikur eru farnar frá, at skattgjaldarin hevur fingið boð um álíkningina. Avgerðin hjá kommunulíkningarvaldinum kann kærast til landsskattanevndina, og skal slík kæra verða latin inn í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at skattgjaldarin hevur fingið boð um avgerðina.

*88. gr.* áleggur felags skattaskrásetingini at senda kommunum ein lista fyri 15. januar yvir allar persónar, feløg o.s.fr., sum skulu setast í skatt til kommununa tað árið. Hesin listin skal eisini hava nøvnini á teimum, sum eru avmarkað skattskyldug sambært 2. gr.

*89. gr.* Sambært galdandi lóg skal skattalistin leggjast almant fram, beint aftaná at álíkningin í kommununum er liðug, og hevur hetta vanliga verið í mai/juni. Eftir hesum uppskoti verður nú skotið upp, at skattalistin verður framlagdur til alment eftirlit beint aftan á 1. oktober. Tá skuldu flestu sjálvuppgávurnar verið endaliga viðgjørdar, soleiðis at endaliga inntøkan kemur at standa á honum, í mun til í dag, tá ið fleiri skattaborgarar ikki eru endaliga áliknaðir og tí standa á listanum við fyribilstølum. Listin, sum eftir hesum uppskoti verður framlagdur, skuldi tí í allarflestum førum vist ta veruligu skattskyldugu inntøkuna hjá einum skattaborgara. Annars verður her ásett, hvussu fram skal farast, um ein skattaborgari ikki er komin við á listan til álíkningina, og nær listin og annað tilfar, sum álíkningin er

gjørd eftir, skal sendast líkningarráðnum.

*90. gr.* Her verður bert ásett, hvussu líkningarvaldið skal fara fram, um ein persónur, sum ikki stendur á listanum, av hægri valdi verður skrivaður á listan, samstundis sum freistin hjá slíkum persóni til at senda líkningarvaldinum kæru í er avmarkað til í seinasta lagi 14 dagar, frá tí hann hevur fingið boð um álíkningina.

*91. gr.* áskrtur, at hvørki skattalistin ella skattaútrokningin ella partur av listanum mega verða almannakunngjørd á annan hátt enn tann, sum er vanligur í kommununi. Hetta vil siga, at t.d partur av listanum ikki kann verða almannakunngjørdur í dag- ella vikubløðunum, og at hann, ið almannakunnger listan ella partar av honum á nevnda hátt, ger seg sekan í lógarbroti.

## Viðmerkingar til 8. kapittul

Reglurnar um skipan og starv líkningarráðsins eru í sínu heild varðveittar óbroyttar í hesi lóggávu.

Tó eru í 92. gr. 5. stk. og 95. gr. gjørdar broytingar, ið skulu geva ráðnum tær neyðugu lógarheimildirnar til ávísar fyrisitingarligar broytingar, herundir at ráðið fær nýggjar arbeiðsuppgávur í sambandi við umskipanina av skattaskipanini til samtíðarskatt.

Her er einamest hugsað um tær fyrisitingareindirnar við starvsfólki settum av líkningarráðnum, sum sambært løgtingssamtykt í løgtingsmáli nr. 42/1982 er samtykt at seta á stovn fyri størri øki. Arbeiðið hjá hesum fyrisitingareindunum fer fyrst og fremst at hava samband við fyribilsskattaskrásetingina, álíkningina og við fyrisitingina av einum arbeiðsgevaraeftirliti.

Til tess at lýsa hesa skipan nærri kann verða tikið burtur úr teim viðmerkingum, sum vóru til pkt. 6 í uppskotinum til fyrr nevndu løgtingssamtykt.

Hvat fyribilsskattaskrásetingini viðvíkur, kemur starvsfólkið á fyrisitingareindunum at hava dagligu avgreiðsluna av øllum spurningum fyribibilsskattaskrásetingini viðvíkjandi. Sambært viðmerkingunum til løgtingssamtyktina er her »einamest hugsað um tað

arbeiði, sum leypandi fer fram í árinum við at skráscta tilflytarar, broyta samb. fráflytingum, broytingar í samband við giftu, deyða og minkandi inntøkum vegna sjúku ella aldur, broyting av útreiðsluupphæddum vegna lántøku o.t.«

Hvat líkningini viðvíkur, varð hugsanin um at skipa líkningarnevndir fyri støri øki slept í álitinum frá meirilutanum, og líknað skal eins og higartil verða í hvørjari kommunu sær av tí einstaka bygda(r)ráð ella líkningarnevnd. Fyrisitingarskrivstovurnar fyri støri øki, t.e. umfatandi fleiri kommunur, skulu tó framvegis avgreiða tann fyrisitingarliga partin av hesi uppgávu.

Hvat endaliga tí sokallaða arbeiðsgevaraeftirlitinum viðvíkur, so stóð í umrøddu viðmerkingunum: »Til at standa fyri eftirlitinum við arbeiðsgevarum verður skipað eitt arbeiðsgevaraeftirlit, ið verður stýrt frá líkningarráðnum. Ráðið setir serútbúgvið fólk, ið hevur ábyrgdina av arbeiðsgevaraeftirlitinum«.

Tó verður lagt afturat í viðmerkingini, at dagligi fyristøðumaðurin á fyrisitingareindunum fer »at taka sær av tí regluliga samstarvinum við arbeiðsgevararnar, t.e. hann hjálpir arbeiðsgevarunum í økinum at fáa skipanina at virka og er leiðbeinandi og upplýsandi stovnur í økinum.«

Annars kann aftur her verða víst á, at landsstýrið eftir 85. gr. skal fyriskipa nærri reglur fyri arbeiðsgongd og starvsskipan hjá fyrisitingareindunum ella deildarskrivstovunum og samstarvið hjá hesum skrivstovum við kommunulíkningarvaldini.

## Viðmerkingar til 9. kapittul

Smb. galdandi skattalóg skulu kærur verða sendar landsskattanevndini, innan juni mánaður er úti, ella áðrenn 4 vikur eru lidnar, frá tí at skattgjaldarin fekk at vita skatt sín.

Í hesi lóg verða hesar freistir broyttar soleiðis, at kæran einans skal verða latin landsskattanevndini innan 4 vikur eftir, at skattgjaldarin fekk at vita skatt sín, tó soleiðis, at tá, smb. 98. gr. 3. stk., kært verður um, at inntøkan hjá øðrum skattgjaldara helst er ov lág,

skal kært verða innan 4 vikur eftir, at skattalistin hevur ligið frammi, til alment eftirlit.

Í 99. gr. 4 stk. er skoytt uppí, at landsskattanevndin, tá hon ger úrskurð um innkomnar kærur, skal grundgeva fyri støðutakan síni.

## Viðmerkingar til 10. kapittul

Greinirnar við reglum um innlating av sjálvuppgávuni og um avleiðingarnar av ikki at lata hana inn rættstundis eru í støðum nakað broyttar.

*Í 100. gr. 2. stk.* er ásett, at nú verður tað líkningarráðið, afturímóti fyrr kommunulíkningarvaldið, sum við serligari kunngerð krevur, at tey, sum skulu verða sett í skatt, geva upp skattskyldugu inntøku sína. Í 4. stk. í somu grein eru viðkaðar reglur um, hvørjar upplýsingar líkningarráðið kann áseta, og sum skulu setast á sjálvuppgávuna. M.a. kann verða ásett, at inntøkur, sum ikki skulu roknast upp í skattskyldugu inntøkuna, skulu tilskilast greiniliga. Her verður hugsað um t.d. endurgjald fyri at nýta egnan bil í tænastu arbeiðsgevarans, skattafrían studning, skattafríar viðbøtur til pensiónir, skattafría kostnaðarviðbótin hjá løgtingsmonnum o.l. Orsøkin til, at hesar inntøkur kunnu krevjast tilskilaðar, er tann, at tær kunnu fáa týdning, tá óbeinleiðis uppgerðir skulu gerast fyri at meta, um samsvar er millum møguliga uppsparing og vunnan pening.

Eisini kann líkningarráðið í sambandi við møguliga uppgerð av eginnýtslu krevja, at á sjálvuppgávuni verður tilskilað, um skattgjaldari, sum ikki hevur roknskaparskyldu, hevur havt útreiðslur av størri útveganum í árinum eins og útreiðslur til húshjálp v.m. Somuleiðis kann verða kravt, at upplýsingar, ið kunnu hava týdning fyri fyribilsskattaskrásetingina, verða tilskilaðar á sjálvuppgávuni, so sum nýtikin byggilán o.l.

Í 5. stk. í hesi grein er tað pettið í galdandi skattalóg tikið burtur, sum sigur, at ikki kann verða kravt, at sundurliðanir verða gjørdar av ogn og skuld í ognaruppgerðini, tá tær frammanundan eru sundurliðaðar í fíggjarstøðuni. Henda fyriskipan er óneyðug, nú kunngerð um minstukrøv til roknskap er lýst at galda.

*Í 101. gr.* er tikin burturúr tann regla, ið sigur, at sjálvuppgáva skal sendast teimum, sum í skattaárinum verða skattskyldug, t.d. tilflyt-

arum úr útlondum. Henda regla er uttan týdning í hesi lóg, tá reglurnar í 68. gr. greiniliga siga, hvussu farast skal fram viðv. persónum, ið ikki fyrr eru álíknaðir ella fyribilsskattaskrásettir.

Galdandi skattalóg talar um teir, ið eru skyldugir at føra góðkendar handilsbøkur, men er henda orðing í hesi lóg broytt til teir, ið skyldugir eru at føra roknskap. Henda broyting er gjørd, orsakað av at nútímans roknskaparførsla ikki longur verður gjørd í løggildum roknskaparbókum, men á leysblað ella við edv.

*Í 103. gr., 3. stk.* er dagbótin, sum kommunulíkningarvaldið og líkningarráðið kunnu døma skattgjaldara at rinda vegna ikki innsendan roknskap, broytt frá 10 kr. til 100 kr.

Reglurnar *í 105. gr.* um, hvør ið hevur heimild at leingja tær freistir, ið ásettar eru í hesi lóg fyri innsending av sjálvuppgávu, eru broyttar frá núgaldandi skattalóg.

Smb. galdandi skattalóg hevur kommunulíkningarvaldið heimild at leingja innsendingarfreistina við upp til einum mánaði. Aftan á henda dag hevur bert líkningarráðið heimild at leingja freistina.

Í hesi lóg verður nú sagt, at líkningarráðið kann gera reglur um, at freistirnar kunnu leingjast, og at kommunulíkningarvaldini bert í serstøkum førum hava heimild at leingja tær freistir, ið ráðið hevur sett.

Ætlanin við hesi broyting í orðingini er at áseta freistirnar hjá teimum, sum hava roknskaparskyldu soleiðis, at øll, ið hava føðingardag í ávísum mánaði, skulu senda inn í seinasta lagi ein ávísan dag, t.d. soleiðis:

| *føðingardagur* | *seinasti innsendingardagur* |
|---|---|
| 1/01-31/03 ..... | 15/2 |
| 1/04-30/06 ..... | 15/3 |
| 1/07-30/09 ..... | 15/4 |
| 1/10-31/12 ..... | 15/5 |

Henda mannagongd hevur eisini við sær, at alt tað stóra arbeiðið, ið liggur í at geva loyvi til at leingja freistirnar, verður spart. Persónar, sum bert hava lønarinntøku, koma ikki undir hesa reglu, men skulu lata sjálvuppgávuna inn innan 15. februar. Persónar, sum ikki hava havt inntøku í inntøkuárinum, kunnu smb. reglum, ið líkningarráðið ásetur eftir 107. gr., bert senda inn til kommunulíkningarvaldið eina undirskrivaða váttan um hetta fástaðin fyri at senda eina sjálvuppgávu. Líkningarráðnum er latið upp í hendur at gera slíkar váttanir, ið skulu verða innlatnar við somu freistum sum sjálvuppgávan.

*Í 108. gr.* verður sagt, at børn, sum eru undir 16 ár, tá inntøkuárið byrjar, bert skulu lata inn sjálvuppgávu, um tey hava inntøkur, sum nevndar eru í 5. gr. 1. stk.

Síðan verður sagt í 109. gr., at um gift kvinna hevur havt inntøku av tí slagnum, sum nevnt er í 4. gr. 2. stk., skal hon sjálv lata inn sjálvuppgávu av hesi inntøku.

Í hesum sambandi er í hesi grein sum nakað nýtt ásett, at hjúnafelagar, ið búgva saman, hava rætt til at gera seg kunnugar við sjálvuppgávurnar hvørt hjá øðrum, áðrenn tær verða innsendar, eins og líkningarvaldið hevur skyldu at lata einum hjúnafelaga upplýsingar um inntøku og skattarokning hjá hinum hjúnafelaganum. Somuleiðis kann ein hjúnafelagi kæra eftir vanligum reglum um skattsetingina hjá hinum hjúnafelaganum.

## Viðmerkingar til 11. kapittul

11. kapittul ásetur reglurnar fyri ognaruppgerðina. Her er eingin broyting gjørd frá verandi lóg.

## Viðmerkingar til 12. kapittul

Í hesum kapitli er ásett, í hvønn mun persónar, feløg, stovnar og onnur hava skyldu at geva skattavaldinum upplýsingar um viðskifti síni við navngivnar persónar, feløg v.m., heruppií eisini upplýsingar um útgoldnar og góðskrivaðar lønir v.m.

Hesar reglur eru í høvuðsheitunum óbroyttar í mun til verandi lóggávu. Onkur ískoyti og onkrar broytingar eru tó gjørdar.

*Í 119. gr.* verður soleiðis skyldan at lata líkningarvaldinum alt roknskapartilfar viðkað til eisini at galda triðjamann, um hann hevur roknskapartilfarið um hendur. Tað vil siga, at eingin kann bera seg undan at lata inn nevnda tilfar við at vísa til, at tilfarið er hjá grannskoðara, bókhaldsstovu v.m., tá hesi nú hava somu skyldu at flýggja út tilfarið sum viðkomandi sjálvur. Tó verður ásett, at skjøl, sum verða latin líkningarvaldinum av nevnda triðjamanni, skulu latast aftur til hansara og ikki til viðkomandi, sum skjølini viðvíkja.

*121. gr.*
Í hesi grein verður skyldan hjá vinnurekandi til at geva upplýsingar um viðskifti sini við einstakar viðskiftamenn, víðkað til eisini at galda fyri nevndir í feløgum, samløgufeløgum, partsreiðarium, stovnanum v.m., uttan mun til um tey eru skattskyldug ella ikki.

*122. gr.*
Í hesi grein verður upplýsingarskyldan hjá keyps- og sølufeløgum smb. 1. gr. nr. 12 og 13 víðkað til at galda øll viðurskifti teirra við einstakar navngivnar limir, t.e. eisini slik, sum ikki hava við vinnu limanna at gera.

*Í 123. og 124. gr.* verður eisini tann núverandi upplýsingarskyldan hjá peningastovnum, tryggingarfeløgum v.m. víðkað til eisini at galda Postverk Føroya og tollvaldið, Føroya Gjaldstova.

Nýskapanin í hesum kapitli í mun til núverandi lóg eru reglurnar *í 125. gr.*, har landsstýrinum saman við líkningarráðnum verður heimilað at gera reglur fyri upprættan og viðlíkahald av eini skrá yvir allar teir, sum smb. reglunum í hesi lóg verða ávísingarskyldugir, t.e. eina arbeiðsgevaraskrá. Smb. hesa lóg verða allir, sum gjalda út A-inntøkur, t.e. eisini allir almennir og privatir stovnar og allar stovnanir, uttan mun til, um teir sjálvir eru skattskyldugir ella ikki, skyldugir at lata seg skráseta í arbeiðsgevaraskránni og at geva líkningarmyndugleikunum tær upplýsingar, ið kravdar verða smb. reglugerð.

Arbeiðsgevarin fær við tilmeldingina eitt »arbeiðsgevaranummar«, sum hann skal nýta, tá hann rindar út lønir gjøgnum afturhaldsskipanina.

Arbeiðsgevarar kunnu eftir hesi lóg ikki gjalda út løn beinleiðis til løntakarar, men skulu avrokna lønina gjøgnum ein av teimum peningastovnunum v.m., sum góðtiknir eru sum avrokningarstøð.

Reglugerðir og veglciðingarskriv til arbeiðsgevarar um, hvussu lønarútgjaldingarnar skulu fara fram, eins og eftirlit við, at áseting-arnar verða fylgdar, verða gjørd av líkningarráðnum, og verður til hetta »arbeiðsgevaraeftirlit« sett fólk, sum fær serútbúgving innan hetta økið.

Arbeiðsgevaraeftirlitið skal fáa í lag neyvt samstarv við allar arbeiðsgevarar í landinum og fáa ta skipan í lag, at teir vitja allar regluliga og virka sum leiðbeinandi stovnur hjá arbeiðsgevarunum. Eisini hevur ráðið heimild til at fara ígjøgnum alt rokniskapartilfar arbeiðsgevarans, antin á staðnum ella við at innkalla alt tilfarið, fyrst

og fremst við tí í hyggju at ansa eftir, at øll lønarútgjalding verður gjørd so sum fyriskipað í lógini.

Samanborið við tær kelduskattaskipanir, vit kenna aðra staðni frá, verður í hesi lóg ikki álagt arbeiðsgevarunum stórvegis arbeiði við útrokning, eftirhalding og inngjalding av skatti, og verður arbeiðsøki hjá arbeiðsgevaraeftirlitinum tí ikki so umfatandi sum aðrastaðni. Arbeiðið verður tó av alstórum týdningi, tá ein av høvuðstreytunum fyri, at samtíðarskattaskipanin fer at virka eftir ætlan, er, at øll lønarútgjalding verður gjørd sum ásett í lógini.

## Viðmerkingar til 13. kapittul

Í sambandi við tær skuldbindingar- og innheintingarreglur, ið ásettar eru í hesum kapitli, verður her nærri fyriskipað, hvussu farast skal fram, um teir ávísingarskyldugu og skattskyldugu, ið nevndir eru í lógini, á ein ella annan hátt ikki halda skyldur sínar mótvegis tí almenna.

Serstakliga verður lagt áherðsla á, at hin ávísingarskyldugi altíð eigur og skal avrokna alla A-inntøku gjøgnum tey avrokningarstøð, ið landsstýrið góðkennir. Ger hann ikki skyldu sína hesum viðvíkjandi, ber hann sjálvur beinleiðis alla ábyrgd av, at tann skattur, ið møguliga vantar í, verður goldin.

Viðvíkjandi sjálvari innheintingini av skattinum er ásett, at tað undir ávísum umstøðum er loyvt skattavaldinum at innheinta ella panta skatt, sum ikki verður goldin av persónligum skattgjaldara, einum búgvi ella felag, sum verður avtikið og skift millum linirnar hjá ávikavist hinum hjúnafelagnum, hjá arvingunum ella hjá limunum í felagnum.

Síðani verður sagt, at um skattur, sum eftir lógini skal gjaldast, ikki er goldin rættstundis, er skattavaldinum heimilað at halda eftir upp til 65% av inntøkuni. Viðmerkjast skal, at hesi 65% eru eitt avgjørt hægstamark, soleiðis hevur skattgjaldarin altíð eitt rímiligt krav um at fáa útgoldið tað, sum eina og hvørja tíð er ásett sum eitt avgjørt lágmark fyri, hvat ið krevst til lívsins uppihald.

Seinast í kapitlinum er nevnd tann vanliga fyrisitingarregla, at skattgjaldari ikki kann koma sær undan at gjalda skatt við at kæra ella mótmæla um skattsetingina ella tann framferðarhátt, ið nýttur er í sambandi við skattainnheintingina.

*129. gr.* Í hesi grein verður ásett, at tann arbeiðsgevari, virki v.m., sum letur vera við at avrokna A-inntøkur gjøgnum avrokningarstøð, ið landsstýrið góðkennir — bankar — sparikassar — posthús v.m., sjálvur ber ábyrgdina av, at tann skattur verður goldin, ið møguliga ikki verður latin tí almenna av honum, ið hevur tikið móti peningunum.

*2. stk.* Undir hesum stykki verður undirstrikað, at tann, sum hevur avroknað A-inntøku gjøgnum tey avrokningarstøð, ið landsstýrið góðkennir, er endaliga leysur og frítikin fyri eitt og hvørt krav frá skattavaldinum um skatt hesi somu A-inntøku viðvíkjandi, t.e. at í slíkum førum er tað avrokningarstaðið, sum ber ábyrgdina av, at tann neyðugi skatturin verður goldin.

*130. gr.* Um so skuldi borið á, at t.d. avrokningarstaðið av misgáum ikki hevur eftirhildið A-skatt av A-inntøku, t.e. løntakarin hevur fingið alla sína løn útgoldna uttan frádrátt fyri skatt, so er í hesi grein tilskilað tann natúrliga regla, at tá so er, skal skattgjaldarin sjálvandi gjalda ta írestandi upphæddina beinanvegin til skattamyndugleikarnar.

*131. gr.* Í hesi grein verður greitt frá, at í førum, har ein persónur, felag v.m. hevur fulltrú vegna teir í gr. 2 avmarkaðu skattskyldugu, ber hann sjálvur ábyrgdina av, at teir skattir, ið verða álagdir hesum avmarkaðu skattskyldugu, verða goldnir.

*132. gr.* Her verður sagt, at um tað av einihvørjari orsøk ikki er gjørligt at innheinta skattin hjá skattgjaldaranum sjálvum, so er skattavaldinum heimilað at panta fyri tann skylduga skattin hjá hjúnafelagnum.

Hetta er tó treytað av, at tann ógoldni skatturin hevur sín uppruna í einum tíðarskeiði, tá hjúnini hava verið skattað saman, sbr. gr. 4. T.e. stavar skatturin frá einum tíðarskeiði, tá hjúnini hava verið skattað hvørt sær, ber hin hjúnafelagin onga ábyrgd av tí ógoldna skattinum.

*133. gr.* Í teimum førum, ið skattur verður álíknaður einum persóni, aftaná at hann er deyður, hevur antin búgvið ella arvingarnir ábyrgdina av, at hann verður goldin. Arvingarnir hava samábyrgd av, at skatturin verður goldin, tó er ábyrgdin avmarkað til ta upphædd, teir hava móttikið ella fingið frammanundan. Síðan verður sagt, at

skuldbinding ikki verður ávirkað av, at innkallað er við proklama, t.e. her kann altíð roknast við eini 5 ára fyrningarfreist, frá tí at skattavaldið hevur havt møguleika fyri at gera kravið galdandi.

*134. gr.* Í hesi grein verður somuleiðis fasthildið, at eigararnir, avtøkustjóri ella møguliga nevndin, bera samábyrgd av ógoldnum skatti hjá felagi, sum er avtikið og síðani skift sundur millum eigararnar.

Skúlanevndin skal eftir nærri reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent, senda á hvørjum ári uppskot til bý/bygdarráðið um eina ætlan um tilboð um frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi eftir 2.-4. tátti í hesi lóg. Leiðarin av frítíðarundirvísingini v.m. í kommununi ger uppskotið.

*2. stk.* Tann ætlan, sum skúlanevndin sendir bý/bygdarráðnum sbr. 1. stk., skal, um so er, at hon ikki fer út um tær rammur, sum eru ásettar á fíggjarætlanini fyri frítíðarundirvísing ella -virksemi eftir ávikavist 2. og 4. tátti, bý/bygdarráðið senda víðari til landsskúlaráðið til endaliga góðkenning. Um so er, at ætlanin fer út um tær ásettu rammur fyri frítíðarundirvísing v.m. eftir 2. ella 4. tátti ella báðar tættir, skal ætlanin, áðrenn hon verður send víðari til landsskúlaráðið til endaliga góðkenning, viðgerast í bý/bygdarráðnum, sum tekur avgerð um møguligar broytingar í ætlanini, í tann mun hon fer út um tær rammur, sum ásettar eru á fíggjarætlanini.

*3. stk.* Bý/bygdarráðið skal fyriskipa, at tann árliga ætlanin um

kommununnar tilboð um frítíðarundirvísing og -virksemi verður send landsskúlaráðnum innan 1. juli.

§ 15

Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent, leiða ta frítíðarundirvísing v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglunum í hesi lóg.

*2. stk.* Um so er, at ein kommuna hevur fleiri skúlaleiðarar, men ongan leiðandi skúlastjóra, so tilnevnir kommunan ein av skúlaleiðarunum at taka sær av tí í 1. stk. nevndu uppgávu. Landsskúlaráðið skal góðkenna hesa tilnevning.

*3. stk.* Eftir tilmæli frá tí í 1. stk. nevnda leiðara kann eitt bý/bygdarráð, eftir at tað hevur fingið ummæli frá skúlanevndini, seta leiðaranum eitt hjálparfólk, sum undir eftirliti leiðarans tekur sær av teimum uppgávum, sum eru lagdar á hann eftir 1. stk.

*4. stk.* Landsskúlaráðið góðkennir tær nærri reglurnar fyri tí virksemi v.m., sum tað í 3. stk. nevnda hjálparfólk kann útinna, og fyri eftirlitinum við tí.

§ 16

Bý/bygdarráðið og skúlanevndin hava skyldu til at tryggja, at ásetanirnar í hesi lóg verða framdar.

*2. stk.* Tær skyldur, sum bý/bygdarráðið og skúlanevndin hava eftir hesi lóg, kunnu eftir góðkenning landsskúlaráðsins heilt ella lutvíst latast einum felagsskúlastýri og avvarðandi felagsskúlanevnd ella øðrum kommunalum felagsskapi upp í hendi.

§ 17

Landsskúlaráðið góðkennir setanarkorini, heruppií somuleiðis lønina hjá leiðarum, hjálparfólki eftir §15, 3. stk. og lærarum við frítíðarundirvísingina v.m.

*2. stk.* Landsskúlaráðið skal tryggja neyðuga samskipan millum frítíðarundirvísingina v.m. í teimum einstøku kommununum eftir hesi lóg og millum hesa undirvísing v.m. og undirvísingina í øðrum undirvísingarstovnum, heruppií serliga fólkaskúlanum. Landsskúlaráðið kann í hesum sambandi geva kommunum boð um neyðugar fyriskipanir til at tryggja hetta.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann seta í verk landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m.

*4. stk.* Landsskúlaráðið ger eina ætlan fyri útbyggingina av frítíðarundirvísingini v.m. eftir hesi lóg.

## 7. táttur

### Studningsreglur v.m.

**§ 18**

Kommunan rindar allar útreiðslur til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2.-4. tátti í hesi lóg, um so er, at ikki annað er ásett í lóg ella reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent.

*2. stk.* Landsskúlaráðið ásetur, í hvønn mun tær goldnu útreiðslurnar kunnu vera góðkendar sum studningsheimilaðar, eins og tað ásetur, hvussu útreiðslurnar skulu býtast millum tvær ella fleiri kommunur, um so er, at kommununnar íbúgvar luttaka í frítíðarundirvísing v.m., fyriskipað og góðkend av øðrum kommunum ella stovnum.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna almennar reglur um tey í 2. stk. nevndu viðurskifti.

**§ 19**

Luttakarar í almennari frítíðarundirvísing eftir 2. tátti skulu rinda eitt gjald, sum landsskúlaráðið góðkennir.

*2. stk.* Luttøka í serstakari frítíðarundirvísing eftir 3. tátti er ókeypis.

*3. stk.* Luttakarar í frítíðarvirksemi eftir 4. tátti skulu sjálvir rinda ein part, sum landsskúlaráðið hevur góðkent.

**§ 20**

Landskassin rindar kommununum 50% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslum til góðkenda almenna frítíðarundirvísing eftir 2. tátti og til góðkent frítíðarvirksemi eftir 4. tátti. Studningurin til serstaka frítíðarundirvísing eftir 3. tátti er 100% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum.

Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um gjaldið av útreiðslunum eftir hesi lóg.

**§ 21**

Bý/bygdarráðið skal árliga innan 1. juli senda landsskúlaráðnum ein av grannskoðara kommununnar áteknaðan roknskap fyri góðkent virksemi.

*2. stk.* Við støði í tí grannskoðaða roknskapinum ger skúlafyrisitingin eitt endaligt býti av útreiðslunum millum kommununa og landskassan.

*3. stk.* Skúlafyrisitingin kann áseta nærri reglur um tilevningina v.m. av roknskapinum.

## 8. táttur

### Aðrar ásetingar

**§ 22**

Landsskúlaráðið kann veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti til frítíðarundirvísing v.m., allan ella lutvísan stuðul. Tað kann fáa í lag, at skeið verða hildin.

**§ 23**

Settur verður á stovn ein grunnur, sum kann veita studning og/ella lán til tess at fremja frítíðarundirvísing v.m. eftir hesi lóg.

*2. stk.* Grunninum verður árliga veitt ein peningaupphædd, ið svarar til 5% av øllum studningsheimilaðum útreiðslum til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2.-4. tátti í hesi lóg. Av tí veittu upphæddini rinda kommununrnar 50% og landskassin 50%. Kommunanna partur verður deildur við helvtini eftir íbúgvaratali og helvtini eftir skattainntøkuni.

*3. stk.* Í grunnin koma somuleiðis rentur og avdráttir av teimum lánum, sum grunnurin hevur veitt, eins og tær serstøku árligu játtanir, ið ásettar eru á fíggjarlógini.

*4. stk.* Landsstýrið ásetur viðtøkurnar fyri grunnin, sum verður stýrdur av landsskúlaráðnum.

## 9. táttur

### Ásetanir um, nær lógin fær gildi v.m.

**§ 24**

Henda lóg fær gildi 1. august 1979.

*2. stk.* Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstudning til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935, fer úr gildi.

# Viðmerkingar til lógaruppskotið

## Vanligar viðmerkingar

### I Inngangur

Tær galdandi reglur um kvøldskúlar standa í kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 hjá kenslumálaráðnum og nr. 276 frá 7. oktober 1935 um studning frá stati til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum. Frá 1949 eru lønirnar vorðnar dagførdar í samsvar við læraralønir fólkaskúlans.

Eftir reglunum í omanfyri nevndu kunngerð er lærugreinarøðin avmarkað til eitt tal av beinleiðis nevndum lærugreinum, og tað er ikki atgongd at taka góðkendar royndir.

Í ásannanini av, at tað fyriliggjandi uppskot til reglur um frítíðarundirvísing v.m. ikki kann hava verið framt, fyrr enn spurningurin um framtíðarinnar bygnað og umsiting av skúlaverkinum allur er loystur, hevur skúlastjórnin tey seinastu árini tulkað tær galdandi reglur ógvuliga víðfevnandi, tá ið talan er um lærugreinarøðina. Undirvísing, sum hevur miðað ímóti góðkendum royndum, er eisini vorðin góðkend, hóast næmingurin kortini hevur tikið royndina sum privatistur á einum undirvísingarstovni, sum hevur prógtøkuheimild. Sum dømi um slíkar royndir eru at nevna royndir í maskinskriving, bókhaldi, týskum (vegna HF) og í siglingarfrøði.

Skúlastjórnin hevur tó ikki hildið seg kunnað tulkað stuðul til frítíðarvirksemi hjá ungfólki í teimum galdandi reglunum.

Í 1960/61 var talið á næmingum í kvøldskúlanum 1.164 við einum samlaðum tímatali upp á 6.773. Hetta talið hevði verið tvífaldað, um so var, at kvøldskúlin hevði fylgt tí mynstri, sum tann danski kvøldskúlin hevði um hetta mundið. Í teimum fylgjandi árum hækkaði talið, og í 1970/71 var næmingatalið hækkað til 2.355 við falt 14.744 tímum.

Í 1977/78 var næmingatalið 4.907 við falt 26.207,5 tímum. Meðan tað fyrr hava verið o.u. 90% kvinnur og 10% menn, so er býtið nú broytt soleiðis, at tað í seinnu árum eru 78% kvinnur og 22% menn. Fyrr vóru tað serstakliga handverkslærugreinirnar, ið helst á bygdunum gjørdu seg galdandi, men í seinnu árum hevur býtið millum lærugreinirnar verið eitt sindur javnari. Tær veruligu bókligu lærugreinir, heruppií maskinskriving og bókhald, fevna um 11-12% av tímatalinum, siglingarfrøði 2-3%, tónleikur og sangur 9%, fimleikur og svimjing 5%, meðan restin, 71%, eru tær ítrivskendu

lærugreinirnar sum handarbeiði, heimkunnleiki, smíð o.s.fr. Henda útbreiðsla heldur fram, og tað er at vænta, at tær meira bókliga kendu lærugreinirnar fara at fevna um ein størri part av tímatalinum í komandi árum.

Tað skal viðmerkjast, at Fróðskaparsetur Føroya hevur havt kvøldskúlaundirvísing í máli í Tórshavn nú í mong ár. Í 1977/78 fingu 254 næmingar undirvísing í tilsaman 720 tímar. Fróðskaparsetrið hevur somuleiðis havt fyrilestrarøðir nú um árini við stórum áhoyraratali.

Í 1977/78 vóru 26% av luttakarunum undir 18 ár, 19% millum 18-25 ár og 55% yvir 25 ár. Sum áður nevnt vóru 78% av luttakarunum kvinnur sundurbýttar í tríggjar aldursbólkar við ávikavist 16,15 og 47% av tí samlaða luttakaratalinum. Menninir vóru 22% og býttir sundur í teir tveir aldursbólkarnar við ávikavist 10,4 og 8% av tí samlaða luttakaratalinum.

## II Innihaldið í lógaruppskotinum

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum var upprunaliga við støði í tí donsku frítíðarlógini at gera eitt uppskot til cina fyriskipan fyri Føroyar. Aftan á løgtingssamtykt um rammulóggávuna um m.a. frítíðarundirvísing v.m. og hennara samtykt í Fólkatinginum er ikki longur neyðugt at fylgja tí donsku lóggávuni á umráðnum, men tó eiga vit at lúka lágmarkið av teimum fyriskipanum, sum ásettar eru í rammulóggávuni.

Viðurskiftini her á landi bera við sær, at tað vegna citt so lítið íbúgvaragrundarlag mangastaðni má fáast í lag eitt samarbeiði millum kommununar, soleiðis at íbúgvarnir í ein hóskandi mun kunnu fáa møguleikar at fáa ta frítíðarundirvísing og - virksemi, sum teir ynskja.

Hesi somu viðurskifti gera, at tað ikki ber til í sama mun sum í einum størri landi at hava ymisk sløg av frítíðarundirvísing og -virksemi samstundis. Úrslitið hevði verið, at einki av teimum ymsu sløgunum hevði kunnað fingið so frægt av luttakarum, at tað hevði verið góðkent. Men tað er ikki bert innan frítíðarundirvísing v.m., at hesi viðurskifti eru av týdningi. Ofta eru so fáir luttakarar til eina ávísa lærugrein í fólkaskúlanum og í øðrum undirvísingarstovnum, at tað ikki eru líkindi at seta undirvísingina í verk. Men samarbeiða teir ymsu stovnarnir, verður ofta luttakaratalið samanlagt so mikið stórt, at undirvísingin kann setast í verk. Eitt tílíkt samarbeiði hevur verið sera torført at fingið til vega undir tí higartil verandi stýrislagi av undirvísingarverkinum, men við tí hægru stýring í tí nýggju stýris-

lógini skuldi tað verið møguligt. Viðmerkjast skal, at fólkaskúlalógin m.a. í §3, 4. stk. ásetur, at landsskúlaráðið kann loyva, at næmingar fólkaskúlans heilt ella lutvíst fáa sína undirvísing á øðrum undirvísingarstovnum enn fólkaskúlanum. Sum tað skilst av viðmerkingunum til hesa reglu, so verður serstakliga hugsað um frítíðarundirvísingina.

*a. Almenn frítíðarundirvísing*

Hesin undirvísingarformur er at skilja sum undirvísing í teimum evnum, sum íbúgvarnir yvir 14 ár í frítíðini ynskja at fáa undirvísing í. Hetta samsvarar við ta fyrrverandi kvøldskúlaundirvísing, sum hóast navnið eisini kann hava farið fram um dagin.

Vavið á undirvísingini og luttakaratalið er fyrst og fremst av fíggjarligum týdningi, og tí eigur landsstýrið at áseta almennar reglur hesum viðvíkjandi. Harafturímóti er innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon eigur at verða løgd til rættis og møguligar avmarkingar í lærugreinarøðini fyrst og fremst av pedagogiskum slagi, og tí eigur landsskúlaráðið at áseta almennar reglur um hesi viðurskifti.

Havandi í huga, at undirvísingarskyldan í fólkaskúlanum endar aftan á 7 ára skúlagongd, t.v.s. í 14-15 ára aldrinum, so heldur arbeiðsbólkurin tað vera rímiligt at seta minstamarkið fyri at kunna luttaka í kvøldskúlaundirvísing til 14 ár. Í serligum førum kann skúlafyrisitingin tó loyva ungdómum undir 14 ár at luttaka.

Tað er tann einstaka kommunan, ið sbr. §3, 1. stk. í lógini skal seta ta almennu frítíðarundirvísingina á stovn, og tað er hon, ið hevur skyldu til at tryggja íbúgvunum í kommununi eitt fjølbroytt undirvísingartilboð, ið sammett við viðurskiftini í kommununi skal vera í einum rímiligum vavi.

Av teimum omanfyri nevndu viðurskiftum viðvíkjandi íbúgvaragrundarlagnum má haldast at vera heilt neyðugt, at leiðarin av skúlaverkinum í kommununi annaðhvørt sjálvur hevur alla kvøldskúlaundirvísingini um hendur, ella at hon undir umsjón hansara verður løgd yvir á tann setta leiðaran fyri frítíðarundirvísingina v.m. Hetta merkir ikki, at ein bólkur ella eitt felag eru vorðin útihýst at hava frítíðarundirvísing bert fyri limirnar í bólkinum ella felagnum. Hetta eigur bert at verða gjørt gjøgnum tann kommunala kvøldskúlan og við góðkenning frá landsskúlaráðnum.

Higartil hevur tann einstaki lærarin á staðnum í flestu førum tikið stig til at byrja kvøldskúlan, og tað hevur sjáldan í størri mun verið nøkur kapping um luttakarar. Í seinni árum hava nakrar av teimum

størru kommunum havt ein leiðara til kvøldskúlaundirvísingina. Hetta hevur havt stóra ávirkan á vavið á kvøldskúlanum í avvarðandi kommunum.

*b. Serstøk frítíðarundirvísing*

Hesin undirvísingarformur fevnir um royndarfyrireikandi undirvísing, yrkiskenda undirvísing og serundirvísing.

Í øllum trimum førum er hóskandi at hava eitt neyvt samarbeiði við aðrar undirvísingarstovnar.

Stovnsetingin av slíkari undirvísing kann bera við sær, at íbúgvarnir í teimum pørtum av landinum, har eingir undirvísingarstovnar eru, sum kunnu bjóða undirvísing av hesum slagi, ella at tað ikki á stovnunum eru nóg nógvir næmingar til hesa undirvísing, koma at fáa betri møguleikar at kunna fáa undirvísing av hesum slagi uttan at verða noyddir at koyra ella flyta í aðra kommunu.

Tað eru kommunurnar, sum hava skyldu til at stovnseta undirvísing av hesum slagi, men til tess at tryggja eitt hóskandi luttakaratal og fyri at sleppa undan óneyðugum spelli er tað landsskúlaráðið, ið ásetur, hvussu og hvar undirvísing av hesum slagi kann fara fram.

*c. Frítíðarvirksemi*

Hetta er eitt nýtt umráði innan frítíðarundirvísingina v.m. her á landi.

Skúlastjórnin hevur í seinnu árum í einum ávísum vavi góðkent, at fólkaskúlin kann geva næmingunum undirvísing í frítíðini serstakliga í teimum musisku lærugreinunum.

Kommunurnar og landsstýrið hava í ein ávísan mun styðjað frítíðarvirksemið. Í hesum viðfangi kann nevnast stuðul til ítróttaendamál og til tónleik (tónleikaskúlar og hornorkestur) og sangkór.

Tað er fyrst og fremst ein lutvíst ónýttur, men stórur tørvur á at tryggja ungdóminum møguleikar fyri einum rímiligum og fjølbroyttum slagi av frítíðarvirksemi.

Umframt teir longu nevndu møguleikarnar kann somuleiðis verða víst á onnur sløg av undirvísingarvirksemi sum t.d. skótarørslur, talvfeløg, frímerkjafeløg v.m.

Ungdómurin hevur fyri neyðini at fáa atgongd til ítrivsverkstaðir og felags- og samveruvirksemi av ymsum slag. Tey veruligu ungdómsfeløgini hava higartil fingið sera lítlan stuðul frá tí almenna.

Tað omanfyri nevnda frítíðarvirksemið er bæði ætlað børnum og ungdómum undir 25 ár sum tí parti av fólkinum, ið er oman fyri 25 ár.

Tað eru tey sløg av frítíðarvirksemi, sum nevnd eru, ið best munnu

vera hóskandi ungdómi undir 25 ár, meðan tað eru onnur, ið best munnu hóska teimum, sum eru eldri enn 25 ár. So eru tað eisini frítíðarvirksemi, sum bæði eru hóskandi fyri tey, sum eru yngri og eldri enn 25 ár.

Hóast skylda kommunanna viðvíkjandi frítíðarvirksemi fyrst og fremst er galdandi teirra vegna, sum eru yngri enn 25 ár, so eigur frítíðarvirksemið ikki at verða avmarkað til henda aldursbólkin. Hin vegin kann lættliga bera á, at viðkomandi frítíðarvirksemi ikki kann gerast veruleiki vegna ov lítla undirtøku.

*d. Høli v.m.*

Sambært lógaruppskotið hava kommunurnar skyldu til at útvega hóskandi høli og uttandura pláss til tað í lógini nevnda virksemið.

Tað almenna, t.v.s. landið, staturin og kommunurnar, skulu ókeypis hava hóskandi høli tøk í tí vavi, sum er sambæriligt við nýtslu teirra annars.

Av reglunum skilst, at tað er landsskúlaráðið, ið ásetur tær neyðugu reglur fyri, hvørji høli eru egnað, nýtslu teirra og fyri møguligari leigu, í tann mun tað almenna ikki eigur hesi høli.

*e. Umsitingarligar reglur*

Í samsvar við stýrislógina er tað fyrst og fremst skúlanevndin, ið hevur ábyrgdina av innihaldinum í frítíðarundirvísingini v.m. eftir hesi lóg.

Bygdarráðið hevur ta fíggjarligu ábyrgdina og skylduna at tryggja, at ein hóskandi ætlan verður gjørd fyri frítíðarundirvísingina v.m. eftir hesi lóg.

Tað er sera týdningarmikið, at tað í lógini verður greidliga sagt, at tað er leiðarin av kommununnar skúlaverki (skúlastjórin, møguliga leiðandi skúlastjóri, fyrstilærari ella einalærari), sum eisini er leiðari av frítíðarundirvísingini v.m. í kommununi.

Orsøkin til hesa lógaráseting er hugsanin um tað sera neyva samarbeiðið, sum neyðugt verður at hava millum teir ymsu undirvísingarstovnarnar. Hetta er fyrst og fremst galdandi millum fólkaskúlan og frítíðarundirvísingina v.m. Tað eru hesir báðir skúlaformar, har skúlanevndin er umsjónarmyndugleiki á staðnum.

Av tí at tað er fólkaskúlin, sum í flestu førum skal hava bæði høli og útbúnað til frítíðarundirvísingina til taks, so má tað haldast at vera náttúrligt, at tað er leiðarin av kommununnar skúlaverki, ið somuleiðis er leiðari av frítíðarundirvísingini v.m. Tað verkliga arbeiðið kann tó verða litið øðrum upp í hendi, men tað er leiðarin av fólka-

skúlanum, sum eigur at hava ábyrgdina av, at skúlaformarnir ikki fara at umskarast, og at allir teir møguleikar, sum miða ímóti at fáa framt eina undirvísing við luttakarum úr ymsum skúlaformum, verða troyttir.

Í teimum kommunum, sum hava fleiri skúlaleiðarar, eigur bý/bygdarráðið at útnevna ein av hesum til leiðara av frítíðarundirvísingini v.m.

Um so er, at tað undir skúlaleiðaranum er kosin serstakur leiðari av frítíðarundirvísingini v.m., so eigur hesin leiðarin at luttaka á fundum í skúlanevndini, sbr. § 9 í stýrislógini.

Arbeiðsbólkurin hevur ta áskoðan, at tær einstøku kommunur fara av umhugsni til íbúgvarnar at royna at seta reglurnar eftir hesi lóg í verk í ein hóskandi mun. Men tó varð hildið vera rætt at áseta, at landsskúlaráðið kann áseta minstukrøv til frítíðarundirvísing v.m. eftir 2. og 4. tátti. Landsskúlaráðið kann somuleiðis seta eitt mestamark fyri støddini á tí samlaða studninginum til tær einstøku kommunurnar. Ynskir ein kommuna at seta eina større frítíðarundirvísing v.m. í verk enn hana, ið samsvarar við tað ásetta studningsmarkið, so kann tað verða gjørt fyri kommununnar egnu rokning, men hóast hetta, so krevst góðkenning frá landsskúlaráðnum, ið eisini, um so verður, kann nokta fyri, at slík økt undirvísingarlig tiltøk verða sett í verk.

*f. Studningur*

Í hesum táttinum standa reglurnar um tey fíggjarligu viðurskiftini.

Í roynd og veru er tað kommunan, sum ber allar útreiðslurnar, og sum eisini fær inntøkurnar gjøgnum samsýning frá luttakarunum.

Eftir teimum reglum, sum higartil hava verið galdandi, fáa kommunurnar 70% í studningi av teimum læraralønum, sum skúlastjórnin hevur ásett fyri kvøldskúlaundirvísing. Aftur at hesum fáa kommunurnar 2/3 av teimum neyðugu ferðaútreiðslunum, sum tó í mesta lagi er sett til 50% av læraralønini hjá tí avvarðandi lærara um dagin. Viðvíkjandi býtinum av studninginum til kommununa millum landskassan og ríkiskassan verður víst til III part í viðmerkingunum. Higartil hevur eingin studningur verið veittur til frítíðarvirksemi.

Í lógaruppskotinum er roknað við einum lægri studningsprosenti enn higartil, men har afturímóti fevna tær studningsheimilaðu útreiðslurnar eisini um aðrar rímiligar útreiðslur enn tær, sum higartil hava verið studningsheimilaðar. Hesi seinast nevndu viðurskifti fara væntandi at stimbra frítíðarundirvísingina serstakliga í teimum smærru kommununum.

Arbeiðisbólkurin hevur ta áskoðan, at tað er gagnligt at lata tey, sum luttaka í almennari frítíðarundirvísing, gjalda eina hóskandi samsýning fyri hesa undirvísing. Higartil hava luttakarar vanliga goldið einar 50 kr. í innskrivingargjaldi. Hetta svarar í mesta lagi til 2,50 kr. um tíman við einum undirvísingartíma um vikuna. Hin vegin eigur luttakarunum at verða veitt trygd fyri, at undirvísingin ikki steðgar vegna fráfall. Hetta hendir, sum kunnugt, eftir teimum núgaldandi reglum.

Arbeiðisbólkurin hevði upprunaliga ta áskoðan, at ungmenni undir 18 ár skuldu ikki gjalda fyri almennu frítíðarundirvísingina, sum umrødd er í 2. tátti. Men seinni er bólkurin komin til tað úrslit, at tað er rímiligt, at eisini hesi ungmenni lata eina samsýning. Tó kann verða tikið til umhugsanar, hvørt skúlanæmingar og onnur, ið eru undir útbúgving, eiga at gjalda minni enn aðrir luttakarar. Hetta sama kundi verið galdandi, tá talan er um tey eftirløntu.

Tað slagið av undirvísing, ið umrødd er í 3. tátti, serstøk frítíðarundirvísing, fer vanliga fram á undirvísingarstovnum, har undirvísingin verður latin næmingunum ókeypis. Luttakararnir skulu sostatt ikki gjalda samsýning fyri hesi sløg av undirvísing.

Sum áður nevnt hevur eingin studningur verið latin eftir tí kvøldskúlalóggávu, vit higartil hava, til tað frítíðarvirksemi, sum umrøtt er í 4. tátti. Í tann mun, sum studningur yvirhøvur er latin, er tað gjørt gjøgnum játtanir á fíggjarætlanini og veitt eftir nærri reglum, sum landsstýrið hevur ásett í hvørjum einstøkum føri.

Arbeiðisbólkurin hevur ikki hildið tað verið ynskjandi at gera reglur um, hvussu studningur eigur at verða veittur, áðrenn nøkur politisk avgerð er tikin í hesum máli.

Tó hevur arbeiðisbólkurin hildið seg kunnað skotið upp,

*at* fíggjarætlan eigur at verða fingin til vega fyri tey avvarðandi virksemi,

*at* tað við støði í teimum innsendu fíggjarætlanunum fyri hvørt einstakt slag av virksemi verður gjørd ein meginfíggjarætlan, sum møguliga verður sundurgreind eftir luttakaratalinum,

*at* kravd verður ein hóskandi fíggjarlig sjálvsíløga hjá tí einstaka luttakaranum, ið verður latin sum limagjald, sjálvboðið arbeiði v.m.

*at* eingin studningur verður latin, um so er, at tann fíggjarligi tørvurin hjá viðkomandi virksemi ikki er størri enn tann íløga, sum luttakararnir hóskandi kunnu metast at gjalda sjálvir.

Viðvíkjandi teimum veruligu ungdómsfeløgunum er at viðmerkja, at tað neyvan kann gerast nøkur meginfíggjarætlan fyri hesi. Tað einstaka felagið eigur at gera eina fíggjarætlan, sum kommunan og

landsskúlaráðið skulu góðkenna. Felagið eigur sjálvt at útvega 20% av hesi fíggjarætlan, meðan kommunan letur tey 80%.

Arbeiðisbólkurin hevur skotið upp, at kommununi verða veitt 50% í studningi av teimum góðkendu útreiðslunum til almenna frítíðarundirvísing og til frítíðarvirksemi. Av tí at studningur er tann sami fyri tey ymsu sløgini av virksemi, hevur tað minni at týða hjá kommunum, hvørt tað einstaka virksemið kemur undir 2. tátt — almenn frítíðarundirvísing — ella 4. tátt — frítíðarvirksemi. Harafturímóti hevur tað týdning fyri luttakararnar og tær útreiðslur, sum teimum lutast við at luttaka. Tað kann vera torført at skilja ímillum tey bæði sløgini av virksemi.

Viðvíkjandi tí serstøku frítíðarundirvísingini verður mælt til, at kommunurnar fáa allar tær góðkendu útreiðslurnar endurgoldnar úr landskassanum. Hetta verður skotið upp við tí í huga, at lands- ella ríkisstovnarnir í løtuni gjalda hesa umrøddu undirvísing. Tað er tí hóskandi, at kommunurnar fáa fult endurgjald, t.v.s. 100%.

Tað má ásannast, at tað verður somulciðis torført at skilja ímillum undirvísing, sum kemur inn undir 2. tátt, og ta undirvísing, sum eigur at koma inn undir 3. tátt. Arbeiðisbólkurin hevur tó ta áskoðan, at tað verður gjørligt at gera ávís almenn stevnumið fyri, hvat ið eigur at koma inn undir 2. tátt, og hvat ið eigur at koma inn undir 3. tátt. Í einstøkum førum er hugsandi, at virksemið kemur bæði inn undir 2. og 3. tátt, treytað av tí einstaka luttakaranum.

*g. Aðrar reglur*

Í hesum tátti standa í §22 fyriskipanirnar um, eftir hvørjum landsskúlaráðið kann veita teimum lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum, stuðul, eins og ráðið sjálvt kann skipa fyri skeiðum.

Sambært §23 verður settur á stovn ein grunnur, sum kann veita studning ella lán til tess at fremja frítíðarundirvísing v.m. Arbeiðisbólkurin vil leggja dent á tann týdning, ein slíkur grunnur hevur. Landsstýrið skal áseta nærri reglur fyri grunsins virki. Skúlafyrisitingin skal undir ábyrgd landsskúlaráðsins stjórna grunninum.

Fæ grunsins er ætlað at nýta til landsumfatandi tiltøk til tess at fremja frítíðarundirvísingina v.m. Hetta kann t.d. fevna um undirvísing gjøgnum útvarp og sjónvarp, bæði av almennum og meira royndarkendum slagi eins og tað bretska »open university« (opið universitet), sum gjøgnum útvarp og sjónvarp undirvísir á universitets stigi.

Fæ grunsins eigur eisini at kunna nýtast til tess at styðja kommunur, sum eru sera vánaliga fyri v.m., ella til tess at fremja frítíðar-

undirvísing v.m. í størri umráðum sum t.d. eini sýslu.

Grunnurin eigur somuleiðis at kunna veita lán ella studning til bygningar, uttandura pláss v.m., amboð, innbúgv o.a., sum brúkt verður í sambandi við frítíðarundirvísing v.m., í tann mun, sum ikki studningur kann verða veittur til á annan hátt. Tað eru framvegis møguleikar fyri stuðuli til ítróttahallir, svimjihallir og ítróttacndamál við 30% úr landskassanum og 20% úr ríkiskassanum — higartil veitt gjøgnum skúlastjórnina. Til ungdómshús verður framvegis at veita studningar við 40% eftir heimild í løgtingslóg nr. 50, dagsett 24. mai 1974, um studning til bygging av ungdómshúsum.

*h. Annað*

Arbeiðisbólkurin hevur umhugsað, hvørt nevndir eiga at verða ásettar um eina ráðgevandi nevnd, sum skal vera landsskúlaráðnum og skúlafyrisitingini til hjálpar.

Arbeiðisbólkurin er samdur um, at ein tílík ráðgevandi nevnd ikki eigur at vera lógfest í frítíðarundirvísingarlógini, men heldur tað vera hóskandi, at landsskúlastjórin í ein neyðugan og hóskandi mun setur eina slíka nevnd. Sambært §6 í stýrislógini hevur hann heimild til tess.

Í hesum viðfangi kann nevnast, at tann týdningarmesta nevndin innan fólkaskúlan, lesiætlanarnevndin, sum ger uppskot til lesiætlanir fólkaskúlans, er ikki lógfest, men sett av skúlastjórnini sum eitt hóskandi og neyðugt tiltak.

## III Tær fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum

*a. Almenn frítíðarundirvísing eftir 2. tátti*

Eftir lógaruppskotinum hava øll yvir 14 ár rætt at luttaka í undirvísing av hesum slagi. Eftir aldursbýtinum íbúgvanna millum hava 30.000 rætt at luttaka í hesi undirvísing.

Í 1977/78 luttóku 4.900 fólk í kvøldskúlaundirvísing. Summi luttóku í fleiri skeiðum. Sostatt luttók ein slakur 1/6 av teimum, sum høvdu rætt at luttaka.

Luttakaratalið fer helst at vaksa við hesum nýggju reglunum, bæði tí at kommununar fáa skyldu til at bjóða undirvísing, og tí at lóggávan ber við sær, at landsmyndugleikin skal virkin royna at fáa frítíðarundirvísingina framda.

Harafturímóti verður eftir galdandi kvøldskúlareglum undirvísing góðkend, sum eftir teimum nýggju reglum helst kemur undir 3. tátt, serstøk frítíðarundirvísing, ella 4. tátt, frítíðarvirksemi, samanber

fyrr síðurnar 2 og 3. Hetta vil bera við sær, at luttakaratalið innan ta almennu frítíðarundirvísingina fer at lækka nakað.

Haraftrat fara vanligar sjónvarpssendingar at byrja um stutta tíð. Tað má haldast, at hetta eisini fer at ávirka luttakaratalið niðureftir.

Havandi hesi viðurskifti í huga metir arbeiðisbólkurin, at tað í sambandi við uppsetingina av teimum fíggjarligu avleiðingum av lógaruppskotinum má roknast við 5.000 luttakaraum árliga. Við eini rímiligari bólkstødd og eini vanligari undirvísingartíð í tíðarskeiðinum 1. oktober - 31. mars svarar hetta til um leið 25.000 læraratimar um árið.

Við tí núverandi læraraløn í kvøldskúlanum upp á 86,- kr. um tíman kann metast, at tær samlaðu útreiðslurnar um tíman verða 100,- kr. Tá er íroknað løn ella viðurlag til leiðararnar og møguligar flutningsútreiðslur bæði til lærararnar og til næmingarnar í teimum førum, har frítíðarundirvísingin má miðsavnast á einum stað. Hetta seinasta ger seg galdandi m.a. á Sandoyar Meginskúla og Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Læraraløniu er roknað sum miðalløn millum ein lærara á 1. stigi og ein á seinasta stigi tann 1. oktober, rundað til heilar krónur.

Verulig nýtsluamboð eiga luttakararnir sjálvir at gjalda, men í ein ávísan mun kann tørvur vera á amboðum til lærararnar og á serligum undirvísingartilfari, sum bert kann verða brúkt til frítíðarundirvísingina.

Vanliga standast ongar útreiðslur av hølum, av tí at teir almennu myndugleikarnir skulu hava tey ókeypis tøk til undirvísingina.

Arbeiðisbólkurin hevur, sum áður nevnt, skotið upp 50% sum endurgjaldsprosent. Hetta endurgjaldið er eitt sindur minni enn tað, kommunurnar higartil fáa fyri kvøldskúlaundirvísing.

Tað viðurlag, sum arbeiðisbólkurin heldur, at luttakararnir sjálvir eiga at gjalda, er ikki talt við upp í endurgjaldsmetingina, sum bert er grundað á tær góðkendu bruttoútreiðslurnar.

Siga vit, *at* lisnir verða 25.000 tímar árliga, *at* útreiðslurnar til hvønn tíma vera 100,- kr. til hvørt skeiðið, verða tær samlaðu útreiðslurnar upp á 2.500.000 kr. býttar sundur við 1.250.000 kr. á landskassan, 500.000 kr. á kommunurnar og 750.000 kr. á luttakararnar. Spurningurin um ríkiskassans studning til landskassan verður viðgjørdur niðanfyri.

*b. Serstøk frítíðarundirvísing eftir 3. tátti*

Teir møguleikar, sum arbeiðisbólkurin hevur havt til tess at meta um tørv og møguleikar at fremja slíka undirvísing, sum her er talan

um, eru bygdir á eitt sera leysligt grundarlag. Mett verður, at í teimum fyrstu árum verður gjørligt at fremja serstaka frítíðarundirvísing, ið samsvarar við 5.000 læraratímum. Mett verður, at útreiðslurnar til hesar tímar verða eisini 100,- kr. uni tíman. Henda útreiðsla fevnir bert um læraraløn, sum í einstøkum førum verður hægri enn vanlig løn fyri frítíðarundirvísing, og møguligar flutningsútreiðslur. Mett verður, at leiðaraløn ella viðurlag kemur undir almenna frítíðarundirvísing.

Sum ávíst í rammulógini skal hetta slagið av undirvísing vera ókeypis. Hetta er tí ásett í § 19,2 stk. í lógaruppskotinum.

Arbeiðisbólkurin hevur ta áskoðan, soleiðis sum tað er komið til orðanna í §5 í reglunum, at landsins myndugleiki, landsskúlaráðið, eigur at stjórna hesum slagi av frítíðarundirvísing á eitt slíkan hátt, at hon lýkur tann neyðuga tørv í mest møguligan mun, og at teir avmarkaðu miðlar verða nýttir sum best.

Henda umrødda undirvísing fer vanliga fram á ymsum undirvísingarstovnum, sum eru fíggjaðir ógvuliga ymist.

Viðvíkjandi royndum fólkaskúlans skal serstakliga viðmerkjast, at tær útreiðslur, sum standast av serstakari frítíðarundirvísing til slíkar royndir, eru at kalla bert lønarútreiðslur. Sum kunnugt rinda kommunurnar einki av lønum fólkaskúlans.

Arbeiðsbólkurin hevur av hesum umstøðum ta áskoðan, at kommunurnar — í tí vavi tær skulu reka undirvísingina — skulu fáa fult endurgjald úr landskassanum fyri útreiðslurnar.

Við støði í omanfyri nevndu ætlan um tímatalið verða útreiðslurnar til serstaka frítíðarundirvising mettar til 500.000,- kr.

*c. Frítíðarvirksemi*

Sambært §7 í rammulógini skal børnum og ungfólki verða tryggjað eitt fjølbroytt tilboð um frítíðarvirksemi í einum vavi, sum høskandi er viðurskiftunum. Tað skal standa øllum børnum og ungfólki, sum eru yngri enn 25 ár, í boði.

Hesin partur av íbúgvum landsins fevnir um 20.000 fólk, men tó heldur arbeiðsbólkurin, at tað møguliga luttakaratalið vanliga verður millum fólk í aldursbólkinum 10-25 ár ella ialt 12.000 fólk. Bólkurin 10-14 ár fer í stóran mun at verða vardur av teirri undirvísing í frítíðini, sum veitast kann næmingunum eftir teirri nýggju fólkaskúlalógini. Hetta er eisini galdandi, men kortini í minni mun, teimum fylgjandi árgangum, ið samsvara við 8.-10. árgang í fólkaskúlanum. Men hin vegin eigur eisini í hesum viðfangi at nevnast, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar á 10 ára aldri og meira, sum eru

virknir luttakarar í ítróttafeløgunum, eins og flestu skótar eisini eru úr hesum bólki.

Av teimum upplýsingum, sum eru til taks um virknar luttakarar í kóri og orkestrum, í skótarbeiði og ítróttarfeløgum verður mett — tá ið vit taka tann partin av íbúgvunum uppí, sum íðkar ítrótt uttan to at vera beinleiðis limir í einum ítróttafelag — at tað eru um leið 7.000, sum luttaka í hesum virkseminum. Meginparturin av teimum, sum luttaka í kórum, orkestrum, og sum íðka ítrótt utan um ítróttafeløgini, er meira enn 25 ár, meðan meginparturin av skótum og virknum limum í ítróttafeløgum er undir 25 ár. Samanumtikið meta vit, at 5.000 av teimum fyrr nevndu 7.000 virknu luttakarunum eru undir 25 ár.

Arbeiðsbólkurin metir, at við tí núverandi íbúgvamynstri verður tað bert gjørligt í einstøkum førum at hava eitt serstakt frítíðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár og eitt annað fyri fólk, sum eru eldri enn 25 ár.

Av hesi orsøk hevur arbeiðsbólkurin gjørt møguleikar fyri í lógaruppskotinum, at fólk yvir 25 ár kunnu luttaka í frítíðarvirksemi fyri fólk undir 25 ár, at ein kommuna eisini kann veita fólkum yvir 25 ár stuðning, og at ein kommuna kann góðkenna frítíðarvirksemi bert fyri fólk, sum eru eldri enn 25 ár.

Í sambandi við uppsetingina av teimum fíggjarligu útrokningunum hevur arbeiðsbólkurin nýtt sum grundarlag eina stuðningsheimilaða útreiðslu um tíman (í tí vavi tímar kunnu roknast) upp á 50 kr. ella helvtina av útreiðslunum til almenna og serstaka frítíðarundirvísing. Í hesi avmarking er ikki tann avmarking, sum t.d. eitt kór ella orkestur kann geva einum instruktøri í løn, men bert avmarkingin í teimum stuðningsheimilaðu útreiðslunum.

Við støði í tí virksemi, sum higartil hevur verið á hesum øki, og tí møguliga stóra tørvi má haldast, at hesin tørvurin kann metast til 50.000 tímar árliga. Henda útreiðsla verður sostatt ialt 2.500.000,- kr., harav luttakararnir sjálvir minst eiga at gjalda 500.000 kr., landskassin 1.250.000 kr. og kommunurnar 750.000 kr.

*d. Fíggjarligar avleiðingar annars*

Sambært 5. grein í lógaruppskotinum skulu teir almennu myndugleikarnir hava høli v.m. ókeypis tøk til frítíðarundirvísing v.m. eftir hesi lóg. Tann myndugleiki, sum eigur viðkomandi høli v.m., skal rinda útreiðslurnar. Mett verður, at í tann mun, virksemini eftir hesi lóg verða størri, enn tey fyrr hava verið, verða útreiðslurnar til høli v.m. eisini at hækka eitt sindur. Hesar útreiðslur fara fyrst og

fremst at koma á kommununurnar sjálvar.

Sambært 1. tátti kann landsskúlaráðið veita studning til lnttøku lærara og leiðara í útbúgvingarskeiðum, eins og tað sjálvt kann halda skeið. Áður hevur hetta ikki verið gjørligt, men í ein ávísan mun hevur tann heimild, sum skúlastjórnin hevur at veita studning til læraranna eftir útbúgving v.m., verið nýtt. Tær øktu útrciðslurnar fara neyvan at vaksa í størri mun.

Sum áður nevnt, kunnu 30% veitast í studningi til ítróttapláss, summpart úr skúlabyggigrunninum og summpart úr ítróttagrunninum, og harafturat verða 20% veitt í ríkisstudningi. Aftur at hesum kann landskassin veita 40% í studningi til ungdómshús.

Ætlanin er, at lán skal kunna veitast úr tí grunni, sum er umrøddur í §24, í tann mun, har hesir møguleikar røkka ov stutt ella ikki kunnu brúkast.

Umframt tær í lógini ásettu tilskrivingar, rentur og avdráttir av umrøddu lánum, so heldur arbeiðsbólkurin, at m.a. lánigrunnurin til ítróttaendamál og ítrótta- og skúlabyggigrunnurin eiga heilt ella lutvíst at koma upp í grunnin.

Við støði í teimum omanfyri nevndu metingum um útreiðslur til reglurnar eftir 2.-4. tátti verða tær árligu veitingarnar eftir §23, 2. stk. 275.000 kr.

*e. Ríkisstudningur til frítíðarundirvísing v.m.*

Sum ávíst í álitinum viðvíkjandi rammulógunum, so er fyritreytin tann, at tær galdandi studningsreglur verða varðveittar. Hetta ber við sær, at kommununum framvegis verða veitt 46 2/3% í ríkisstudningi av tímagjaldinum eftir teimum stevnumiðum, sum nevnd eru í §14 í lógarkunngerð nr. 257, dagsett 14. juni 1960, sbr. viðmerking til §20.3.31.51.06 á fíggjarlógini. Ríkisstudningurin er dupult so stórur sum landskassastudningurin.

Eftir teimum núgaldandi reglum eru møguleikarnir at fremja serstaka frítíðarundirvísing og serstakliga frítíðarvirksemi vorðnir avmarkaðir av teimum undirvísingarevnum, sum nevnd eru í teimum galdandi reglum. Fremjanin av teimum nýggju reglunum í lógaruppskotinum fara at stimbra um áhugan fyri teimum í 3. og 4. tátti nevndu tiltøkum.

Rammulógin áleggur kommununum eina skyldu at tryggja íbúgvunum eitt fjølbroytt tilboð innan serstaka frítíðarundirvísing eftir 3. tátti og frítíðarvirksemi eftir 4. tátti fyri børn og ungfólk undir 25 ár. Henda skylda ber eftir arbeiðsbólksins uppfatan við sær, at ríkisstudningur eigur at verða veittur til hetta.

Tann núgaldandi endurgjaldsskipan kann í høvuðsdráttum verða varðveitt í viðurskiftinum millum landskassan og ríkiskassan, men hetta fer kortini at volda ávísar trupulleikar fyrisitingarliga. Hugsandi um eina smidliga og hóskandi skipan av frítíðarundirvísingini v.m. heldur arbeiðsbólkurin, at í viðurskiftunum millum kommunurnar og landskassan (landsskúlaráðið) er neyðugt at nýta ta studningsskipan, sum skotin er upp í lógaruppskotinum, sjálvt um hildið verður neyðugt at varðveita tann háttin fyri ríkisstudningi, sum áður hevur verið nýttur.

Tó heldur arbeiðsbólkurin tað ikki vera rímiligt ella hóskandi, at ríkisstudningurin til almenna frítíðarundirvísing framvegis skal verða dupult so stórur sum landskassans studningur, treytað av, at ríkisstudningur verður veittur til tey í 3. og 4. tátti nevndu tiltøk. Undir hesum viðurskiftum heldur arbeiðsbólkurin, at landskassin eigur at fáa 50% í studningi úr ríkiskassanum av landskassans útreiðslum. Hetta er ein býtisháttur, sum er vanligur á mongum økjum. Arbeiðsbólkurin heldur, at tá talan er um studning til bygningar v.m., eiga tær enn galdandi reglur og siðvenjur framvegis at verða varðveittar.

Spurningurin um framhaldandi ríkisstudning eigur at verða greiddur við avtalu millum ríkið og heimastýrið.

*f. Samandráttur*

Havandi í huga tær fyrr nevndu fortreytir v.m. ber til at seta upp fylgjandi yvirlit yvir tær væntaðu útreiðslurnar til tiltøkini eftir hesum lógaruppskoti, uttan at vit tó hava íroknað studning til nýgerð ella lán eftir §23 í uppskotinum.

**Í 1000 kr.**

| **Slag** | **Privatu** | **Kommunurnar** | **Landið** | **Ríkið** | **Ialt** |
|---|---|---|---|---|---|
| Almenn frítíðarundirvísing eftir 2. tátti .... | 750 | 500 | 625 | 625 | 2.500 |
| Serstøk frítíðarundirvísing eftir 3. tátti .... | — | — | 250 | 250 | 500 |
| Frítíðarvirksemi eftir 4. tátti 1) ..... | 500 | 750 | 625 | 625 | 2.500 |
| Grunnveitingar (§23) . | — | 137,5 | 68,75 | 68,75 | 275 |
| **Ialt** | **1.250** | **1.387,5** | **1.568,75** | **1.568,75** | **5.775** |

1) Viðmerkjast skal, at hetta er minsta upphæddin, av tí at frítíðarvirksemið fer fyri ein part væntandi at verða dýrari enn tann góðkenda studningsheimilaða fíggjarætlan, og at tað fyri ein part í sjálvum sær krevur so fáar fíggjarligar tiltaksveitingar, at studningur ikki eigur at verða veittur av tí almenna.

Um so er, at tær reglur um ríkisstudning, sum higartil hava verið galdandi, verða varðveittar, heldur arbeiðsbólkurin, at tað kann haldast at vera ráðiligt at meta, at ríkisstudningur svarandi til 35.000 tímar kann verða veittur. Við eini læraraløn upp á 86 kr. og einum studningi upp á 46 2/3% gevur hetta ein samlaðan ríkisstudning, ið svarar til stívliga 1,4 mill. kr. ella góðar 200.000 kr. minni enn í omanfyri nevnda uppskoti. Landskassans útreiðslur fara at vaksa samsvarandi.

Í niðanfyri nevnda yvirliti eru útreiðslurnar til kvøldskúlarnar í Føroyum í árunum 1972/73-1977/78 og tær ætlaðu útreiðslurnar fyri 1978/79 settar upp.

**Í 1000 kr.**

| Ár | Privatu[1)] | Kommunurnar | Landið | Ríkið | Ískt[2)] |
|---|---|---|---|---|---|
| 1972/73 | 110 | 131 | 110 | 196 | 500 |
| 1973/74 | 100 | 203 | 182 | 291 | 750 |
| 1974/75 | 110 | 164 | 70 | 315 | 650 |
| 1975/76 | 170 | 307 | 239 | 478 | 1.200 |
| 1976/77 | 200 | 481 | 374 | 748 | 1.800 |
| 1977/78 | 230 | 634 | 504 | 976 | 2.300 |
| 1978/79 (ætl.) | 250 | 765 | 595 | 1.190 | 2.800 |

1) Tær privatu útreiðslurnar eru mettar við støði í luttakaratalinum og 50 kr. í undirvísingargjaldi.
2) Upphæddirnar, sum standa í hesum teigi, eru avrundaðar, av tí at — aftur at teimum veruligu útreiðslunum — koma eisini upp í henda teigin tær ætlaðu útreiðslurnar.

Á løgtingsins fíggjarlóg í fíggjarárinum 1979/80 er sett ein peningaupphædd á §14 konto nr. 2260 - kvøldskúlar upp á 583.000 kr. Harumframt eru settar á §14 konto nr. 3112 - Studningur til ÍSF 742.000 kr.

Løgtingstíðindi 1982 B 140

og konto nr. 2389 - Tónleikur og sangur 200.000 kr. Arbeiðsbólkurin metir, at í framtíðini fara ið hvussu er partar av teimum báðum síðst nevndu konto at verða nýttir til tiltøk eftir hesi lóg. Tað er heldur ikki óhugsandi, at tað eru útreiðslur á øðrum konti, sum í framtíðini eiga at koma undir hesa lóg. Hóast hesi viðurskifti metir arbeiðsbólkurin, at landskassans útreiðslur til tess at fremja tiltøkini eftir hesum lógaruppskoti krevja øktar peningajáttanir. Harafturímóti kann sigast, at verður lógaruppskotið framt eftir tess ætlan, so fer tað at roynast sum ein hjálpandi hond at loysa teir ymsu trupulleikar m.a. á bygdunum og hjá ungfólkinum um alt landið.

Arbeiðsbólkurin hevur frammanfyri mett um tað væntaða virksemið, um so er, at lógaruppskotið verður sett í verk. Hugsa vit okkum, at virksemið bert verður til helvtar av tí, vit mettu, so verða tær samlaðu útreiðslurnar slakar 2,9 mill. kr. Hetta samsvarar yvirhøvur við tær ætlaðu útreiðslurnar bert til kvøldskúlan í fíggjarárinum 1978/79. Aftur at hesum koma tær útreiðslur, sum t.d. eru goldnar til ítrótt o.a.t., og sum eftir lógaruppskotinum ætlast at vera veittar gjøgnum hetta í framtíðini.

Áður er nevnt, at landsskúlaráðið kann áseta lágmark og hámark fyri frítíðarundirvísing v.m. eftir lógaruppskotinum. Teir játtandi myndugleikar kunnu á sama hátt við at áseta støddina á kontoupphæddini avmarka virksemini eftir lógini. Bæði landsskúlaráðið og teir játtandi myndugleikar eru tó í ein vissan mun bundnir av reglunum í §§2 og 7 í rammulógini, har tað er ásett, at myndugleikarnir skulu tryggja, at íbúgvarnir í kommununi fáa eitt fjølbroytt tilboð um frítíðarundirvísing v.m. í einum vavi, sum *hóskandi* er til viðurskiftini.

Orðið hóskandi ber í sjálvum sær reiðiliga stóran møguleika fyri tulking.

## Viðmerkingar til tær einstøku reglurnar

### Til 1. tátt. Frítíðarundirvísingarinnar hugtak

*Til § 1*

Reglan ásetur almennt, hvat ið frítíðarundirvísing v.m. er, og nevnir heimildina hjá lógini.

### Til 2. tátt. Almenn frítíðarundirvísing

*Til § 2*

Reglurnar í 1. stk. siga, hvat ið tann almenna frítíðarundirvísingin er.

Í 2. stk. verður ásett, at landsstýrið kann geva almennar reglur um almenna frítíðarundirvísing.

Í 3. stk. stendur heimildin hjá landsskúlaráðnum at góðkenna avmarkingar í undirvísingarevnunum, eins og tað kann góðkenna reglur um innihaldið, og hvussu lagt skal vera til rættis. Her snýr tað seg um faklig og pedagogisk viðurskifti, har rættindini einans liggja hjá landsskúlaráðnum, sum fremur tey gjøgnum skúlafyrisitingina.

*Til § 7*

Reglan heimilar beinleiðis, at undirvísarar á øðrum undirvísingarstovnum kunnu lata undirvísing eftir hesum tátti koma upp í teirra skylduga tímatal.

*Til § 8*

Reglan ásetur, at næmingar í fólkaskúlanum ella á øðrum undirvísingarstovnum kunnu bert luttaka í serstakari frítíðarundirvísing av tí slagi, sum nevnt er í § 5, við loyvi frá skúlafyrisitingini.

Hetta er gjørt við tí í huga, at næmingar ikki eiga at kunna — uttan í heilt serstøkum førum — fáa sama dag undirvísing á tveir ymiskar hættir.

### Til 4. tátt. Frítíðarundirvísing

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar í II, broti C.

*Til § 9*

Reglan ásetur, at ein kommuna hevur skyldur at ansa eftir, at tað verður tryggjað børnum og ungfólki undir 25 ár eitt fjølbroytt tilboð

um frítíðarvirksemi í einum vavi, sum hóskandi er viðurskiftunum í kommununi. Hetta samsvarar við §§7-8 í rammulógini.

Tilboðið kann eins væl vera beinleiðis fyriskipað av kommununi sum av privatum fyritakssemi.

Á sama hátt sum viðvíkjandi almennari frítíðarundirvísing kann landsstýrið áseta almennar reglur um frítíðarvirksemi, meðan landsskúlaráðið góðkennir sjálvt innihaldið, og tað góðkennir somuleiðis nærri reglur um, hvussu kommununrnar skulu veita studning til frítíðarvirksemi.

*Til § 10*

Reglan gevur eini kommunu møguleika at góðkenna, at fólk yvir 25 ár kunnu luttaka í frítíðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár.

Í 2. stk. er ásett, at ein kommuna kann góðkenna frítíðarvirksemi bert hjá fólki, sum er yvir 25 ár. Góðkenningin eftir 1. og 2. stk. kann fara fram bæði uttan og við studningi, tá talan er um fólk yvir 25 ár.

Tær nærri reglur um góðkenning, slagið og innihaldið í fritíðarvirkseminum eftir hesi grein og reglurnar um studning verða ásettar á sama hátt sum frítíðarvirksemið fyri børn og ungfólk undir 25 ár eftir §9.

*Til § 11*

Reglan sigur treytirnar til tess at góðkenna frítíðarvirksemi. Av tí at virksemissløgini eftir hesum tátti kunnu vera ógvuliga skiftandi, og av tí at tørvur kann vera á at deila aldursbólkarnar, um so er, at viðurskiftini benda tann vegin, so er í 2. stk. ein regla, eftir hvørjum skúlaráðið kann loyva frávikum frá teimum almennu treytunum.

**Til 5. tátt. Høli v.m.**

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar omanfyri í II broti d.

**Til 6. tátt. Fyrisitingarligar reglur**

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar omanfyri í II broti e

*Til § 13*

Reglan í 1. stk. samsvarar við § 17 í stýrislógini.

*Til § 14*

Sambært stýrislógini, sbr. § 13 í hesi lóg, hevur bygdarráðið skyldu at tryggja, at tað verður givið íbúgvunum eitt hóskandi tilboð av frítíðarundirvísing v.m., eins og tað skal hava teir neyðugu miðlar til taks. Harafturímóti hevur skúlanevndin ta pedagogisku og innihaldsligu ábyrgd av frítíðarundirvísingini v.m. í tí vavi, hon heldur seg innan fyri tær fíggjarligu rammur, sum bygdarráðið hevur ásett fyri fyriskipanunum eftir lógaruppskotinum.

*Til § 17*

Í regluni standa tær serstøku uppgávur, sum landsskúlaráðið skal hava um hendi umframt tær umsjónarligu.

Sambært 1. stk. góðkennir landsskúlaráðið sctanarkorini, heruppí lønirnar hjá lærarum og leiðarum v.m.

Sambært 2. stk. skal landsskúlaráðið tryggja ta neyðugu samskipan millum tær ymsu kommununar. Í roynd og veru kann væntast, at landsskúlaráðið góðkennir almenn stevnumið fyri samskipanini, og skúlafyrisitingin tekur avgerð í teimum einstøku førunum.

Reglan í 3. stk. heimilar landsskúlaráðnum sjálvum at fremja landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m.

Umsíðir stendur í 4. stk. ein regla um, at landsskúlaráðið skal gera eina útbyggingarætlan fyri fyriskipanirnar eftir lógaruppskotinum.

**Til 7. tátt. Studningsreglur v.m.**

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar í II broti f.

**Til 8. tátt. Aðrar reglur**

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar í II broti g.

**Til 9. tátt. Gildisreglan**

Arbeiðisbólkurin hevur mett, at henda lóg kann kunngerast innan 1. august 1979.

# Uppskot til

## løgtingslóg um frítíðar-undirvísing v.m.

## lagtingslov om fritids-undervisning m.v.

**§1.** Frítíðarundirvísing v.m. er undirvísing og virksemi, sum verða boðin út eftir hesi lóg, ið er givin út sambært ramnulóg fyri Føroyar um frítíðarundirvísing v.m.

**§1.** Fritidsundervisning m.v. er undervisning og virksomhed tilbudt efter denne lov, der er udstedt i henhold til rammelov for Færøerne om fritidsundervisning m.v.

## 2. táttur

### Almenn frítíðarundirvísing

## Kapitel 2

### Almen fritidsundervisning

**§2.** Tann almenna frítíðarundirvísingin skal tryggja íbúgvunum í einari kommunu eitt fjølbroytt tilboð um undirvísing í teimum evnum, sum íbúgvarnir yvir 14 ár ynskja undirvísing í.

*2. stk.* Kommunurnar seta á stovn almenna frítíðarundirvísing sambært 1. stk. í einum vavi, sum er hóskandi eftir viðurskiftunum í kommununi.

**§2.** Den almene fritidsundervisning skal sikre en kommunes beboere et alsidigt tilbud om undervisning i de emner, hvori befolkningen over 14 år i fritiden måtte ønske undervisning.

*Stk. 2.* Kommunerne etablerer den i stk. 1 nævnte undervisning i et efter den enkelte kommunes forhold rimeligt omfang.

**§3.** Almenn frítíðarundirvísing skal lúka hesar treytir:

1) undirvísingin skal standa øllum yvir 14 ár í boði,

**§3.** Almen fritidsundervisning skal opfylde følgende betingelser:

1) undervisningen skal stå åben for alle over 14 år,

2) undirvísingin skal vera løgd til rættis eftir eini ætlan, sum tryggjar, at givin verður ein verulig undirvísing við eini fjølbroyttari lýsing av evninum. Undirvísingin skal vera skipað hóskandi eftir evnunum,
3) undirvísingin skal fevna um í minsta lagi 20 tímar og í mesta lagi 120 tímar í hvørjum evni,
4) undirvísingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði,
5) lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at kunna undirvísing í viðkomandi evnum.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

2) undervisningen skal være tilrettelagt efter en plan, som sikrer, at der gives en egentlig undervisning med en alsidig belysning af emnet. Undervisningen skal have en for emnet hensigtsmæssig form,
3) undervisningen skal omfatte mindst 20 timer og højst 120 timer i hvert emne,
4) undervisningen skal gennemføres i egnede lokaler med fornødent udstyr,
5) lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at undervise i de pågældende emner.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1.

**§4.** Almenn frítíðarundirvísing kann skipast við sjálvstøðugari stovnseting av frítíðarundirvísing, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til frítíðarundirvísing í øðrum kommunum ella við samarbeiði við aðrar undirvísingarstovnar ella felagsskapir.

*2. stk.* Tær einstøku kommununrnar hava skyldu til í tann mun, tað er pláss í góðkendum flokkum, at taka ímóti íbúgvum úr øðrum kommunum til frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um skyldu

**§4.** Almen fritidsundervisning kan iværksættes ved selvstændig etablering af fritidsundervisning, ved samarbejde med andre kommuner, ved henvisning til fritidsundervisning i andre kommuner eller ved samarbejde med andre undervisningsinstitutioner eller organisationer.

*Stk. 2.* De enkelte kommuner har pligt til, i det omfang der er plads på godkendte hold, at modtage andre kommuners beboere til almen fritidsundervisning efter dette kapitel.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan godkende regler for kom-

kommunanna eftir 1. og 2. stk.

§5. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um almenna frítíðarundirvísing.

*2. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis, herímillum avmarkingar í undirvísingarevnunum.

*3. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann undir serligum umstøðum loyva ungfólki undir 14 ár at luttaka í frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

munens forpligtelser efter 1. og 2. stk.

§5. Landsstyret kan fastsætte generelle regler om almen fritidsundervisning.

*Stk. 2.* Undervisningsrådet kan godkende regler om undervisningens indhold og tilrettelæggelse, herunder begrænsninger i emnekredsen.

*Stk. 3.* Undervisningsdirektoratet kan under særlige omstændigheder tillade unge under 14 år at deltage i fritidsundervisningen efter dette kapitel.

## 3. táttur

### Serstøk frítíðarundirvísing

§6. Kommunurnar hava skyldu til í tí vavi, sum tørvur er á, at seta á stovn serstaka frítíðarundirvísing fyri íbúgvarar yvir 14 ár, sum fevnir um:

1) royndarfyrireikandi undirvísing, sum eftir ynski hjá tí einstaka luttakaranum kann enda við góðkendari roynd ella prógtøku,
2) yrkiskenda undirvísing, sum miðar ímóti einum ávísum arbeiðsøki,
3) serundirvísing sambært §5, stk. 3 í rammulógini.

§7. Skeiðini skulu lúka hesar treytir:

## Kapitel 3

### Særlig fritidsundervisning

§6. Kommunerne har pligt til, i det omfang der er behov herfor, at etablere særlig fritidsundervisning for befolkningen over 14 år omfattende:

1) prøveforberedende undervisning, der efter den enkelte deltagers ønske kan afsluttes med godkendt prøve eller eksamen,
2) erhvervsmæssig undervisning med sigte mod et bestemt arbejdsområde,
3) specialundervisning ifølge rammelovens §5, stk. 3.

§7. Kurserne skal opfylde følgende betingelser:

1) undirvísingin skal standa øllum íbúgvum yvir 14 ár í boði,
2) undirvísingin skal verða løgd til rættis samsvarandi teimum ætlanum, sum eru ásettar fyri viðkomandi lærugrein ella evni,
3) undirvísingin skal vera ókeypis,
4) undirvísingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði,
5) lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at geva viðkomandi undirvísing.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

**§8.** Lærarar á øðrum undirvísingarstovnum v.m. kunnu eftir nærri meginreglum, sum Landsskúlaráðið ásetir, taka á seg ta í hesum tátti nevndu undirvísing: Skylduga undirvísingartímatalið læraranna á viðkomandi stovni kann verða niðurskorið samsvarandi.

**§9.** Landsstýrið kann áseta almennar reglur um serstaka fritíðarundirvísing.

*2. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis.

1) undervisningen skal stå åben for alle over 14 år,
2) undervisningen skal være tilrettelagt i overensstemmelse med de planer, der er fastlagt for det pågældende fag eller emne,
3) undervisningen skal være vederlagsfri,
4) undervisningen skal gennemføres i egnede lokaler med fornødent udstyr,
5) lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at give den pågældende undervisning.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1.

**§8.** Lærerne ved andre undervisningsinstitutioner m.v. kan efter nærmere av Undervisningsrådet fastsatte retningslinier overtage undervisningen ved den i nærværende kapitel omhandlede fritidsundervisning. Der vil kunne ske en tilsvarende nedsættelse af lærernes pligtige undervisningstimetal ved den pågældende institution.

**§9.** Landsstyret kan fastsætte generelle regler om særlig fritidsundervisning.

*Stk. 2.* Undervisningsrådet kan godkende regler om undervisningens indhold og tilrettelæggelse.

*3. stk.* Landsskúlaráðið ásetir, um skylda kommununanna eftir §6,1. stk., skal hókast við sjálvstøðugari stovnseting av undirvísing av hesum slagi, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til undirvísing í øðrum kommununum ella til kommunalar ella ikki kommunalar skúlar v.m.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet fastsætter, hvorvidt kommunernes pligt efter §6, stk. 1 skal opfyldes ved selvstændig etablering af undervisning af denne art, ved samarbejde med andre kommuner, ved henvisning til andre kommuners undervisning eller til kommunale eller ikke kommunale skoler m.v.

**§10.** Teir næmingar, sum fáa undirvísing í samsvarandi lærugreinum í fólkaskúlanum ella á øðrum undirvísingarstovnum, kunnu bert luttaka í serstakari frítíðarundirvísing eftir hesum tátti við loyvi frá Landsskúlafyrisitingini.

**§10.** Deltagelse i særlig fritidsundervisning efter nærværende kapitel af elever, der modtager undervisning i tilsvarende fag i folkeskolen eller andre undervisningsinstitutioner, kan kun ske efter tilladelse fra Undervisningsdirektoratet.

## 4. táttur

### Frítíðarvirksemi

## Kapitel 4

### Fritidsvirksomhed

**§11.** Bý/bygdarráðið eigur at tryggja, at tað í einum vavi, sum er hóskandi eftir viðurskiftunum í kommununi, verður givið íbúgvunum eitt fjølbroytt tilboð um frítíðarvirksemi, sum skal vera fyri øll børn og ung undir 25 ár.

**§11.** By/bygderådet sikrer i et efter forholdene i kommunen rimeligt omfang, at der gives kommunens beboere et alsidigt tilbud om fritidsvirksomhed, som skal stå åben for alle børn og unge under 25 år.

*2. stk.* Ein kommuna kann góðkenna, at fólk yvir 25 ár luttaka í frítíðarvirksemi eftir 1. stk. Hon kann somuleiðis góðkenna, at frítíðarvirksemi bert verður skipað fyri fólk yvir 25 ár.

*Stk. 2.* En kommune kan godkende, at personer over 25 år deltager i den i 1. stk. nævnte fritidsvirksomhed. Den kan ligeledes godkende, at fritidsvirksomhed alene etableres for personer over 25 år.

*3. stk.* Landsstýrið ásetir

*Stk. 3.* Landsstyret fastsætter

nærri reglur um innihaldið og vavið av frítíðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.

nærmere regler om indholdet og omfanget af fritidsvirksomhed efter stk. 1 og 2.

## 5. táttur

### Høli v.m.

**§ 12.** Bý/bygdaráðið útvegar egnað høli ella uttandura pláss við neyðugum útbúnaði til frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi fyri íbúgvararnar.

*2. stk.* Skúlar, onnur egnað høli og uttandura pláss, sum tað almenna eigur, skulu vera til taks í einum vavi, ið er hóskandi og sambæriligt við nýtslu teirra annars.

*3. stk.* Aðrir skúlar, høli og uttandura pláss, sum lands- og/ella ríkiskassin til rakstur og/ella bygging hava goldið lán og/ella studning til, skulu vera til taks í einum vavi, sum er hóskandi og sambæriligt við nýtslu teirra annars, eftir reglum, sum Landsskúlaráðið góðkennir.

## Kapitel 5

### Lokaler m.v.

**§ 12.** By/bygderådet tilvejebringer egnede lokaler eller udendørs anlæg med fornødent udstyr til fritidsundervisning og fritidsvirksomhed for beboerne.

*Stk. 2.* Skoler, andre egnede lokaler og udendørs anlæg, der tilhører det offentlige, skal stilles til rådighed i det omfang, det er rimeligt og foreneligt med deres øvrige brug.

*Stk. 3.* Andre skoler, lokaler og udendørs anlæg, til hvis drift og/eller anlæg der er udbetalt lån og/eller tilskud fra lands- og/eller statskassen, skal i det omfang, det er rimeligt og foreneligt med deres øvrige brug, stilles til rådighed efter regler, der godkendes af undervisningsrådet.

## 6. táttur

### Fyrisitingarligar reglur

**§ 13.** Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, leiða ta frítíðarundir-

## Kapitel 6

### Administrative bestemmelser

§ 13. Lederen af en kommunes skolevæsen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte regler lede den fritids

vising v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglum í hesi lóg.

*2. stk.* Um so er, at ein kommuna hevur fleiri skúlaleiðarar, men ongan leiðandi skúlastjóra, so tilnevnir kommunan ein av skúlaleiðarunum at taka sær av tí í 1. stk. nevnda verkevni. Landsskúlaráðið skal góðkenna hesa tilnevning.

*3. stk.* Eftir tilmæli frá tí í 1. stk. nevnda leiðara kann eitt bý/bygdaráð, eftir at tað hevur fingið ummæli frá skúlanevndini seta leiðaranum eitt ella fleiri hjálparfólk, sum undir eftirliti leiðarans tekur sær av teimum verkevnum, sum eru løgd á leiðaran eftir 1. stk.

*4. stk.* Landsskúlafyrisitingin kann áleggja einum bý/bygdaráði at seta leiðarum eitt hjálparfólk. Setanin fer fram eftir teimum í 3. stk. nevndu reglum.

*5. stk.* Landsskúlaráðið góðkennir nærri reglur fyri tí virksemi v.m., sum tað í 3. stk. nevnda hjálparfólk kann útinna, og eftirlitinum við tí.

*6. stk.* Landsskúlaráðið ásetir setanarkorini og lønina hjá leiðarum, hjálparfólki eftir §13, 3. stk. og lærarum við frítíðarundirvísingina v.m.

undervisning m.v., der etableres i kommunen efter bestemmelserne i denne lov.

*Stk. 2.* Har en kommune med flere skoleledere ingen ledende skoleinspektør, udpeger kommunen en af skolelederne til at varetage den i stk. 1 nævnte opgave. Den foretagne udpegning skal godkendes af Undervisningsrådet.

*Stk. 3.* Efter indstilling af den i stk. 1 nævnte leder kan et by/bygderåd efter indhentet udtalelse af skolekommissionen ansætte en eller flere medhjælpere for lederen, der under dennes tilsyn varetager de opgaver, der er pålagt lederen efter stk. 1.

*Stk. 4.* Undervisningsdirektoratet kan pålægge et by/bygderåd at ansætte en medhjælper for lederen. Ansættelsen sker efter de i stk. 3 anførte regler.

*Stk. 5.* Undervisningsrådet godkender de nærmere regler for den virksomhed m.v., den i stk. 3 omhandlede medhjælper kan udøve og for tilsynet hermed.

*Stk. 6.* Undervisningsrådet fastsætter ansættelsesvilkårene og aflønningen for ledere, medhjælpere efter §13, stk. 3 og lærere ved fritidsundervisningen m.v.

**§ 14.** Bý/bygdaráðið og skúlanevndin hava skyldu at tryggja, at ásetingarnar í hesi lóg verða fylgdar.

*2. stk.* Tær skyldur, sum bý/bygdaráðið og skúlanevndin hava eftir hesi lóg, kunnu eftir góðkenning Landsskúlaráðsins heilt ella lutvíst latast einum felagsstýri og viðkomandi felagsskúlanevnd ella øðrum kommunalum felagsskapi upp í hendi.

*3. stk.* Tær í 2. stk. nevndu skyldur, ið eru latnar til ein annan stovn, kunnu, um hetta er hentast, og við góðkenning Landsskúlaráðsins, við 1/2 árs frest verða fluttar aftur til kommununa til byrjan av einum skúlaári.

**§ 15.** Landsskúlafyrisitingin tryggjar neyðuga samskipan millum frítíðarundirvísingina v.m. eftir hesi lóg í teimum einstøku kommunum og millum hesa undirvísing v.m. og undirvísingina í øðrum undirvísingarstovnum.

*2. stk.* Landsskúlaráðið kann seta í verk landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m.

**§ 16.** Eftir teimum av Landsskúlaráðnum ásettu reglum skulu kommunurnar á hvørjum ári senda inn ætlan um ta frítíðarundirvísing v.m., ið kommunan ætlar at fremja í komandi skúlaári eftir reglunum í hesari lóg.

**§ 14.** By/bygderådet og skolekommissionen har pligt til at sikre gennemførelsen af bestemmelserne i denne lov.

*Stk. 2.* By/bygderådet og skolekommissionens pligter efter denne lov kan efter godkendelse af Undervisningsrådet helt eller delvis overtages af en forbundsstyrelse respektive forbundsskolekommission eller anden sammenslutning.

*Stk. 3.* De i stk. 2 omhandlede af en forbundsstyrelse m.m. overtagne pligter kan, såfremt dette vil være hensigtsmæssigt og med undervisningsrådets godkendelse, med 1/2 års frist tilbageflyttes til kommunen til et skoleårs begyndelse.

**§ 15.** Undervisningsdirektoratet sikrer den fornødne koordination mellem de enkelte kommuners fritidsundervisning m.v. efter denne lov og mellem denne undervisning m.v. og undervisning ved andre undervisningsinstitutioner.

*Stk. 2.* Undervisningsrådet kan iværksætte landsomfattende fritidsundervisning m.v.

**§ 16.** Kommunerne skal årligt efter nærmere af undervisningsrådet fastsatte bestemmelser indsende en plan over den fritidsundervisning m.v., kommunen vil etablere i det kommende skoleår efter reglerne i denne lov.

## 7. táttur

### Studningsreglur v.m.

**§ 17.** Kommunan ber allar útreiðslur til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2.-3. tátti í hesi lóg, um so er, at ikki annað er ásett í lóg ella reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent.

*2. stk.* Landsskúlafyrisitingin ásetir, í hvønn mun tær goldnu útreiðslurnar kunnu vera góðkendar sum studningsheimilaðar, eins og hon ásetir, hvussu útreiðslurnar skulu býtast millum tvær ella fleiri kommunur, um so er, at íbúgvarnarnir í eini kommunu luttaka í frítíðarundirvísing v.m., sum er fyriskipað og góðkend av øðrum kommunum ella stovnum.

*3. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna almennar reglur um tey í 2. stk. nevndu viðurskifti.

**§ 18.** Luttakarar í almennari frítíðarundirvísing eftir 2. tátti skulu rinda eitt gjald, sum landsskúlafyrisitingin hevur góðkent.

*2. stk.* Luttøka í serstakari frítíðarundirvísing eftir 3. tátti er ókeypis.

*3. stk.* Luttakarar í frítíðarvirksemi eftir 4. tátti skulu sjálvir rinda ein part, sum landsskúlafyrisitingin hevur góðkent.

## Kapitel 7

### Tilskudsregler m.v.

§ 17. Samtlige udgifter til godkendt fritidsundervisning m.v. efter denne lovs kapitel 2-3 afholdes af kommunen, såfremt andet ikke måtte være fastsat ved lov eller bestemmelser godkendt af Undervisningsrådet.

*Stk. 2.* Undervisningsdirektoratet fastsætter, i hvilket omfang de afholdte udgifter kan godkendes som tilskudsberettigede, ligesom det fastsætter, hvorledes udgifterne skal fordeles mellem to eller flere kommuner, hvis en kommunes beboere deltager i fritidsundervisning m.v., etableret og godkendt af andre kommuner eller institutioner.

*Stk. 3.* Undervisningsrådet kan godkende generelle regler om de i stk. 2 omhandlede forhold.

§ 18. Deltagere i almen fritidsundervisning efter kapitel 2 skal betale et vederlag, der godkendes af Undervisningsdirektoratet.

*Stk. 2.* Deltagelse i særlig fritidsundervisning efter kapitel 3 er vederlagsfri.

*Stk. 3.* Deltagere i fritidsvirksomhed efter kapitel 4 skal selv afholde en af Undervisningsdirektoratet godkendt andel.

§ 19. Landskassin veitir studning til útreiðslur kommunanna til frítíðarundirvísing v.m. eftir hesi lóg.

*2. stk.* Studningurin er 50% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda almenna frítíðarundirvísing eftir 2. tátti og 100% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda serstaka frítíðarundirvísing eftir 3. tátti.

*3. stk.* Til frítíðarvirksemi eftir 4. tátti kann landskassin veita kommunum í mesta lagi 50% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum.

*4. stk.* Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um, hvør skal bera útreiðslurnar eftir hesi lóg.

§ 20. Studningur eftir § 19 kann í mesta lagi verða nettoútreiðslur kommunanna til tey í 2.-4. tátti nevndu verkevni, tá byggiútreiðslur eru ikki tiknar við.

§ 19. Af landskassen ydes tilskud til kommunernes udgifter til fritidsundervisning m.v. efter denne lov.

*Stk. 2.* Tilskuddet udgør 50% af de tilskudsberettigede udgifter til godkendt almen fritidsundervisning efter kapitel 2 og 100% af de tilskudsberettigede udgifter til godkendt særlig fritidsundervisning efter kapitel 3.

*Stk. 3.* Til fritidsvirksomhed efter kapitel 4 kan landskassen yde kommunerne et tilskud på op til 50% af de tilskudsberettigede udgifter.

*Stk. 4.* Undervisningsrådet kan godkende nærmere regler for afholdelse af udgifterne efter denne lov.

§ 20. Tilskud efter § 19 kan maksimalt udgøre kommunernes nettoudgifter til de i kapitel 2-4 nævnte formål, når der bortses fra byggeudgifter.

## 8. táttur

## Aðrar ásetingar

§ 21. Landsskúlafyrisitingin kann veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti til frítíðarundirvísing v.m., allan ella lutvisan stuðul. Hon kann skipa fyri, at skeið verða hildin.

## Kapitel 8

## Andre bestemmelser

§ 21. Undervisningsdirektoratet kan yde hel eller delvis støtte til lederes og læreres deltagelse i uddannelseskurser med henblik på fritidsundervisning m.v. Det kan foranledige kurser afholdt.

## 9. táttur

### Ásetanir um, nær lógin fær gildi, v.m.

**§22.** Henda lóg fær gildi 1. august 1983.

*2. stk.* Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstudning til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935, fer samstundis úr gildi.

## Kapitel 9

### Ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.

§22. Denne lov træder i kraft 1. august 1983.

*Stk. 2.* Bekendtgørelse nr. 9 af 22. januar 1931 om tilskud fra staten til ungdoms- og aftenskoler på Færøerne, jfr. bekendtgørelse nr. 276 af 7. oktober 1935, ophæves samtidig.

**Skjal 20C**

*Skjal 2*

# Reglugerð

## fyri kommunalum stuðli til frítíðarfeløg í Klaksvíkar kommunu

1.

Treytin fyri at fáa stuðul sambært hesi reglugerð er, at góðkent umsoknarblað verður nýtt, og at hetta verður útfylt gjølliga.

2.

Tað er eisini ein treyt, at grannskoðaður roknskapur, fíggjarstøða og eitt fullfíggjað yvirlit yvir limir felagsins verða send saman við umsóknini.

3.

Frítíðarfeløg, sum fáa stuðul sambært hesi reglugerð, skulu verða slík, har øll kunnu gerast limir uttan mun til starv, átrúnaðarliga og politiska áskoðan.

4.

Tá hesar treytir eru loknar, kann stuðul verða veittur til tær í gr. 5 nevndu útreiðslur eftir teimum í gr. 6 uppsettu reglum.

5.

Stuðul kann verða veittur til hølisútreiðslur, venjara, til aðrar rakstrarútreiðslur, til uttanlandsferðir og í sambandi við fremmandavitjan.

6.

Til hølisútreiðslur og venjara verður í mesta lagi veittur stuðul, ið svarar til 20% av kostnaðinum. Til aðrar rakstrarútreiðslur verður í mesta lagi veittur stuðul, sum svarar til 10% av hesum útreiðslum. Til uttanlandsferðir og í sambandi við fremmandavitjan verður í mesta lagi veittur stuðul, ið svarar til eina upphædd, sum verður ásett av Mentunarnevndini á hvørjum ári.

7.
Umsóknir um stuðul í einum fíggjarári skulu verða Mentunarnevnd býráðsins í hendi í seinasta lagi tríggjar mánaðir, áðrenn viðkomandi fíggjarár byrjar, og skal Mentunarnevndin í hvørjum føri sum nú innstilla til býráðið, sum so tekur støðu.

8.
Tá talan er um stuðul til uttanlandsferðir og í sambandi við fremmandavitjan, kann undantak verða gjørt frá reglunum í gr. 7.

Henda reglugerð er viðtikin á býráðsfundi 2. mai 1978.

**Skjal 20D**

*Skjal 3*

Felagsnevnd Føroya Kommunufelags og Tórshavnar býráðs til gerð av egnum uppskoti um lóg um frítíðar-undirvísing v.m.

Í Tórshavn tann 30. mars 1983

Skúlanevnd Føroya løgtings
3800 Tórshavn

**Viðv. uppskoti um løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m.**

Føroysku kommunurnar hava síðan í februar mánaði 1982 roynt at fingið føroysku skúlamyndugleikarnar: landsstýrið, landsskúlaráðið, landsskúlafyrisitingina og seinri skúlanevnd løgtingsins á tal um gomlu kvøldskúlalógina, hvussu hon hevur virkað, og hvørjar ábøtur og broytingar, ið áttu og kundu verið gjørdar.

Hetta hevur ikki borið til, og ístaðin hava kommunurnar verið tvingaðar til at viðgera og ummæla eitt uppskot um lóg um frítíðar-undirvísing v.m., ið landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið.

Um ársskiftið 1982/83 hildu kommunurnar, at tá slík samrøða ikki kundi fara fram um gomlu kvøldskúlalógina, so máttu kommunurnar sjálvar royna at evna til eitt lógaruppskot, ið javnbjóðis við landsstýrisins kundi verða viðgjørt í løgtinginum.

Á fundi tann 26. februar 1983, ið skúlanevnd løgtingsins skipaði fyri, og sum higartil er tað nærmasta, ið komið er til dialog ímillum landsskúlamyndugleikarnar og skúlamyndugleikarnar á staðnum, fingu kommunurnar frest til 1. apríl at koma við teirra við-merkingum.

At hetta varð alt ov stutt skotbrá, varð greitt skúlanevndini frá, men av tí at longri skotbrá ikki fekst, hava kommunurnar, darvaðar

av tíðarkrevjandi fíggjarætlanararbeiði, líkningararbeiði o.ø, kortini roynt at evna til sítt egna uppskot.

Tíðartrotið merkir tó tíverri úrslitið.

Skúlanevndini kunnugt eru allar føroyskar kommunurnar ímóti so ógreiðum uppskoti um frítíðarvirksemi, ið lagt er upp til í uppskoti landsstýrisins, har avgerðarrætturin og avgerð um komand innihald í skyldum kommunanna um frítíðarvirksemi liggur uttan fyri kommunurnar og uttan fyri lóggávuvaldið, Føroya løgting, men liggur hjá landsskúlaráði, ið kommunurnar ikki sleppa at tala við, og hjá landsskúlafyrisitingini.

Í dag fer fram í at kalla øllum størri føroyskum kommunum eitt rættiliga stórt og fjølbroytt frítíðarvirksemi.

Hetta virksemi er sprottið úr privatum initiativi í felagsskapum og virkar og mennist ofta at kalla heilt uttan stuðul frá nøkrum almennum myndugleika. Sumt av hesum virksemi verður tó stuðlað óbeinleiðis og beinleiðis av kommununum, og sumt fær stuðul bæði frá kommunum og øðrum almennum myndugleika.

At ørkymla hetta virksemi við at koma við lógarreglum um frítíðarvirksemi í kommunum uttan eftir samráðing við kommunurnar kenst kommununum ovboðið, og tá serliga tá innihaldið í uppskotinum, uttan hvør ið hevur avgerðarrættin, er so ógreitt.

Kommunurnar sóu tí helst, at parturin um frítíðarvirksemi varð strikaður í lógini.

Men í dag fer tó eisini fram frítíðarvirksemi í kommununum, ið er sprottið úr toygdari tulking og nýtslu av gomlu kvøldskúlalógini.

At missa møguleikan fyri hesum frítíðarvirksemi er tó ikki ynski kommunanna. Heldur ynskja tær, at tað kemur í fastari legu.

Herumframt viðurkenna kommunurnar, at rammulóg um frítíðarundirvísing v.m. er givin 14. februar 1979.

Hjálagda uppskot um lóg um frítíðarundirvísing v.m. er gjørt út frá hesi viðurkenning og út frá tí greiðu fyritreyt, at avgerðin um tað rímiliga og tað fjølbroytta liggur hjá kommununum og hjá kommunalu skúlanevndunum.

Kommunurnar og kommunalu skúlanevndirnar viðurkenna skyldur sínar sbrt. lógina og eru sjálvar førar fyri at taka støðu — alt samanumtikið — um tað rímiliga og tað fjølbroytta.

Hjálagda uppskot er bygt upp sum ein tilboðslóg, har intentiónirnar hjá landsskúlamyndugleikunum kunnu koma fram í samlaða tilboðnum um studning, men har avgerðarrætturin liggur hjá kommununum.

Við tí skotbrái, ið er givið, hevur ikki verið gjørligt at viðgjørt upp-

skotið í teimum formellu kommunalu organum, men út frá framman-fyri standandi viðmerkingum og fyritreytum og út frá teimum við-merkingum, ið eru knýttar til hvørja lógargrein, gevur uppskotið eina rættiliga sanna mynd av støðu kommununanna.

Nevndin er annars tilreiðar at koma á fund skúlanevndarinnar um uppskotið og greiða nærri frá tí og møguligum ivamálum.

| | | |
|---|---|---|
| J. Mørkøre<br>(sign.) | Paula Christiansen<br>(sign.) | Finnur Johansen<br>(sign.) |
| Kjartan Kristiansen<br>(sign.) | Poul Johs. Johansen<br>(sign.) | A. Lómaklett<br>(sign.) |

**Skjal 20E**

*Skjal 4*

# Løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m.

## 1. táttur. Hugtak frítíðarundirvísingarinnar

**§1.** Frítíðarundirvísing v.m. er undirvísing og virksemi, sum verða boðin út eftir hesi lóg, ið er givin út sambært rammulóg fyri Føroyar

## 2. táttur. Almenn frítíðarundirvísing

**§2.** Kommunurnar seta á stovn almenna frítíðarundirvísing, ið skal tryggja íbúgvunum í kommununi eitt hóskandi fjølbroytt tilboð um undirvísing í teimum evnum, sum íbúgvararnir yvir 14 ár ynskja undirvísing í. Undirvísingin skal vera í einum vavi, sum er rímiligt eftir viðurskiftunum.

**§3.** Almenn frítíðarundirvísing skal lúka hesar treytir:

1) Undirvísingin skal standa øllum yvir 14 ár í boði.

2) Undirvísingin skal vera løgd til rættis eftir eini ætlan, sum tryggjar, at givin verður ein verulig undirvísing við eini fjølbroyttari lýsing av evninum. Undirvísingarætlanin kann eisini umfata fyrilestrarrøðir, lesiringar og sovorðið.

3) Undirvísingin eigur í minsta lagi at fevna um 20 tímar í hvørjum evni og í mesta lagi 120 tímar í hvørji lærugrein.

4) Undirvísingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.

5) Lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at kunna undirvísa í viðkomandi evnum.

6) Luttakarar skulu bert hava loyvi til í serligum førum og tá undir serligum treytum at vera við á sama skeiði meira enn einaferð.

*2. pætti.* Í serstøkum førum kunnu frávik verða gjørd frá reglunum í **1**. petti.

**§4.** Almenn frítíðarundirvíing kann skipast við sjálvstøðugari stovnseting av frítíðarundirvísing, við samarbeiði við aðrar kommunur, við

ávísing til frítíðarundirvísing í øðrum kommunum ella við samarbeiði við aðrar undirvísingarstovnar ella felagsskapir.

*2. petti.* Tær einstøku kommunurnar hava skyldu til í tann mun, tað er pláss, at taka ímóti íbúgvum úr øðrum kommunum til frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

*3. petti.* Landsskúlaráðið kann góðkenna skyldu kommunanna eftir 1. og 2. petti.

**§5.** Landsstýrið kann áseta almennar reglur um almenna frítíðarundirvísing.

*2. petti.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis, herímillum avmarkingar í undirvísingarevnunum.

*3. petti.* Undir serligum umstøðum kann ungfólki undir 14 ár verða loyvt at luttaka í frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

### 3. táttur. Serstøk frítíðarundirvísing

**§6.** Kommunurnar hava skyldu til í tí vavi, sum tørvur er á, at seta á stovn serstaka frítíðarundirvísing, sum fevnir um:

1) royndarfyrireikandi undirvísing, sum eftir ynski hjá tí einstaka luttakaranum kann enda við roynd ella prógvtøku,

2) yrkiskenda undirvísing, sum miðar ímóti einum ávísum arbeiðsøki.

3) serundirvísing.

**§7.** Skeiðini skulu lúka hesar treytir:

1) Undirvísingin skal standa øllum íbúgvum yvir 14 ár í boði.

2) Undirvísingin skal verða løgd til rættis samsvarandi teimum ætlanunum, sum eru ásettar fyri viðkomandi lærugrein ella evni.

3) Undirvísingin skal vera ókeypis.

4) Undirvísingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.

5) Lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at geva viðkomandi undirvísing.

*2. petti.* Í serstøkum førum kunnu frávik verða gjørd frá reglunum í 1. petti.

**§8.** Lærarar á øðrum undirvísingarstovnum v.m. kunnu eftir nærri meginreglum, sum Landsskúlaráðið ásetir, taka á seg ta í hesum tátti nevndu undirvísing.

**§9.** Landsstýrið kann ásetta almennar reglur um serstaka frítíðarundirvísing.

*2. pætti.* Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis.

*3. pætti.* Landsskúlaráðið kann góðkenna, um skylda kommunanna eftir §6, 1. pætti ikki skal lúkast við sjálvstøðugari stovnseting av undirvísing av hesum slagi, men við samarbeiði við aðrar kommunur við ávísing til undirvísing í øðrum kommunum ella til kommunalar ella ikki kommunalar skúlar v.m.

## 4. táttur. Studningsreglur

**§10.** Kommunan ber allar útreiðslur til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2. og 3. tátti í hesi lóg, um ikki annað er ásett í lóg ella reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent.

**§11.** Landskassin veitir studning til útreiðslur kommunanna av góðkendari frítíðarundirvísing sbrt. §10.

*2. pætti.* Studningurin er 50% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda, almenna frítíðarundirvísing eftir 2. tátti og 100% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda, serstaka frítíðarundirvísing eftir 3. tátti.

**§12.** Sum studningsheimilaðar útreiðslur verða roknaðar:

a) Allar læraralønir.

b) Allar leiðaralønir og lønir til hjálparfólk.

c) Neyðugar ferðaútreiðslur hjá lærarum og leiðarum.

d) Aðrar útreiðslur sbrt. reglum, ið landsskúlaráðið ásetir og landsstýrið góðkennir.

**§13.** Luttakarar í almennari frítíðarundirvísing eftir 2. tátti og luttakarar í serstakari frítíðarundirvísing eftir 3. tátti rinda einki fyri sjálva undirvísingina.

*2. pætti.* Luttakarar í undirvising eftir 2. og 3. tátti rinda kommununum fyri nýtslu av skúlum og øðrum egnaðum hølum við ljósi, hita, reingerð, neyðugari umsókn, møguliga leigu v.m. Gjaldið verður ásett

sum innlimingargjald fyri hvørt undirvísingarevni sær og kann verða ásett ymiskt fyri ymiskar aldursbólkar. Landsskúlafyrisitingin ásetir, hvat minsta innlimingargjaldið í hvørjum einstøkum føri kann verða.

*3. petti.* Luttakararnir gjalda sjálvir undirvísingartilfar og annað tilfar, ið er neyðugt fyri undirvísingina.

**§14.** Fyri at fáa studning eftir §11, 2. petti, krevst, at landsskúlafyrisitingin frá býar/bygdaráðnum hevur fingið til góðkenningar fyri 1. mars fullfíggjaða ætlan um undirvísing eftir 2. og 3. tátti fyri komandi undirvísingarár.

*2. petti.* Í ætlanini skal vera tilskilað:

a) Hvørji evni undirvíst verður í, og hvussu undirvísingin verður løgd tilrættis.

b) Hvørjir lærarar koma at undirvísa í hvørjum evni.

c) Hvat luttakararnir sbr. §13, 2. petti, og hvussu gjaldið er

d) Hvat luttakararnir gjalda sbr. §13, 2. petti, og hvussu gjaldið er útroknað.

e) Hvør er leiðari av undirvísingini, og hvussu leiðarin verður løntur.

f) Hvørjar ferðaútreiðslur fyri lærarar og leiðarar verða goldnar.

g) Hvørji frávik ætlast gjørd frá §3, 1. petti og §7, 1. petti, og um luttakarar eru undir 14 ár.

*3. petti.* Í seinasta lagi 15. mai boðar landsskúlafyrisitingin frá, hvørt ætlanin er góðkend, ella hvørjir partar av ætlanini eru góðkendir, og hvørjar treytir verða settar fyri at góðkenna alla ætlanina. Samstundis boðar landsskúlafyrisitingin frá, um hon hevur fíggjarliga rúmd til at rinda lógásettan studning til alla góðkendu ætlanina ella hvussu stóran part.

*4. petti.* Fyri 1. juni boðar kommunan landsskúlafyrisitingini frá, hvørjar broytingar í ætlanini eru gjørdar sbrt. 3. petti.

*5. petti.* Um ætlað góðkend undirvísing ikki kann verða framd, kann kommunan, so skjótt hon er varug við hetta, biðja um góðkenning av aðrari undirvísing í staðin.

**§15.** Býar/bygdaráðið skal árliga innan 1. juli senda landsskúlafyrisitingini ein av grannskoðara kommununnar áteknaðan roknskap fyri góðkenda undirvísing í seinasta undirvísingarári.

*2. petti.* Við støði í tí grannskoðaða roknskapinum ger Landsskúlafyrisitingin eitt endaligt útreiðslubýti millum kommununa og landskassan.

*3. petti.* Landsskúlafyrisitingin kann áseta nærri reglur um tilevningina v.m. av roknskapinum.

## 5. táttur. Frítíðarvirksemi

**§16.** Kommunan ansar eftir, at tað — undir almennari fyriskipan og eftirliti — í einum vavi, sum er rímiligt eftir viðurskiftunum, verður veitt børnum og ungum eitt fjølbroytt tilboð um frítíðarvirksemi.

**§17.** Slíkt frítíðarvirksemi eigur at verða lagt til rættis og standa øllum børnum og ungum undir 25 ár í boði eftir almennum eyðkennum.

*2. petti.* Kommunan kann avgera, um slíkt frítíðarvirksemi eisini skal standa fólki yvir 25 ár í boði, og um tað einans skal standa fólki yvir 25 ár í boði.

**§18.** Frítíðarvirksemi sbrt. §§16 og 17 kann verða skipað sum framhald av almennari frítíðarundirvising.

*2. petti.* Landsskúlaráðið staðfestir eitt yvirlit yvir hvørji evni í almennari frítíðarundirvísing, sum kunnu verða skipað sum frítíðarvirksemi.

**§19.** Skúlar, onnur egnað høli og uttandura pláss, sum tað almenna eigur, skulu vera til taks í einum vavi, ið er rímiligt og sambæriligt við nýtslu teirra annars.

*2. petti.* Aðrir skúlar, høli og uttandura pláss, sum lands- og/ella ríkiskassin til rakstur og/ella bygging hava goldið lán og/ella studning, skulu vera til taks í einum vavi, sum er rímiligt og sambæriligt við nýtslu teirra annars.

*3. petti.* Bý/bygdaráðið kann annars útvega onnur egnað høli ella uttandura pláss við neyðugum útbúnaði til frítíðarvirksemi fyri íbúgvararnar.

**§20.** Til frítíðarvirksemi sbrt. §18 kann landskassin veita studning til útreiðslur kommunanna eftir hesum átti, um hesar treytir eru loknar:

a) At luttakarar í frítíðarvirksemi rinda kommunum fyri nýtslu av skúlum og øðrum egnaðum hølum við ljósi, hita, reingerð, neyðugari umsjón, møguliga leigu v.m. Gjaldið verður ásett sum innlimingargjald fyri hvørt undirvísingarevni sær og kann verða ásett ymiskt fyri ymiskar aldursbólkar. Landsskúlafyrisitingin ásetir, hvat minsta innlimingargjaldið í hvørjum einstøkum føri kann verða.

b) At luttakarar í frítíðarvirksemi sjálvir rinda bøkur, amboð og tilfar.

c) At luttakarar í frítíðarvirksemi rinda kommununi, ið hvussu so er tað av landsskúlafyrisitingini góðkenda, minsta gjald til tilrættalegging, undirvísing og leiðslu.

d) At frítíðarvirksemið er í samsvari við tær av landsstýrinum ásettu almennu reglur um frítíðarvirksemi.

e) At frítíðarvirksemið er í samsvari við tær av landsskúlaráðnum góðkendu nærri reglur um innihald í tilboðnum um frítíðarvirksemi.

f) At frítíðarvirksemið er í samsvari við tað av landsskúlaráðnum staðfesta yvirlit yvir góðkent frítíðarvirksemi, sbr. §18, 2. petti.

g) At landsskúlafyrisitingin kann góðkenna møguliga avgerð hjá kommunu um, at fólk yvir 25 ár luttaka í frítíðarvirkseminum.

h) At landsskúlafyrisitingin kann góðkenna møguliga avgerð hjá kommunu um, at frítíðarvirksemið bert verður skipað fyri fólk yvir 25 ár.

§21. Landskassin veitir upp til 50% í studningi til útreiðslur kommunanna eftir §20, 1. petti, ltr. c, til tilrættalegging, undirvísing og leiðslu, um landsskúlafyrisitingin áðrenn 1. mars frá bý/bygdaráðnum hevur fingið til góðkenningar ætlan um frítíðarvirksemi, ið ætlast framt í komandi undirvísingarári.

*2. petti.* Í ætlanini skal verða tilskilað

a) Hvørji virksemi ætlanin er at hava og við hvussu mongum luttakarum.

b) Hvørji koma at standa fyri hvørjum einstøkum virksemi.

c) Í hvørjum hølum ella á hvørjum uttandura plássum virksemi ætlast at fara fram.

d) Hvat gjald luttakararnir skulu gjalda sbrt. §20, 1. petti, ltr. a og c, og hvussu hetta er útroknað.

e) Um frítíðarvirksemi einans er ætlað børnum og ungum undir 25 ár ella eisini ella bert fólki yvir 25 ár.

*3. petti.* Í seinasta lagi 15. mai boðar landsskúlafyrisitingin frá, hvørt ætlað frítíðarvirksemi kann góðkennast sum studningsberandi og við hvussu stórum studningsparti.

*4. petti* Áðrenn 1. juni boðar bý/bygdaráðið landsskúlafyrisitingini frá, hvørji frítíðarvirksemi verða framd við ætlaðum studningi.

*5. petti.* Um ætlað góðkent frítíðarvirksemi ikki kann verða framt, kann bý/bygdaráðið biðja um góðkenning av øðrum frítíðarvirksemi í staðin.

**§22.** Bý/bygdaráðið skal árliga innan 1. juli senda landsskúlafyrisitingini ein av grannskoðara kommununnar áteknaðan roknskap fyri góðkent virksemi í seinasta undirvísingarári.

*2. petti.* Við støði í tí grannskoðaða roknskapinum ger landsskúlafyrisitingin eitt endaligt útreiðslubýti millum kommununa og landskassan.

*3. petti.* Landsskúlafyrisitingin kann áseta nærri reglur um tilevningina v.m. av roknskapinum.

**§23.** Kommunurnar kunnu umframt at skipa fyri frítíðarvirksemi sbrt. §18 stuðla privatum frítíðarvirksemi í feløgum undir almennum eftirliti eftir reglum, sum bý/bygdaráðið samtykkir.

*2. petti.* Slíkur stuðul kann verða givin sum beinleiðis og óbeinleiðis ískoyti til útreiðslur felaganna til høli, uttandura øki, ljós, hita, umsjón v.m.

*3. petti.* Landskassin kann í undantaksføri veita studning til útreiðslur kommunanna eftir 1. og 2. petti.

## 6. táttur. Fyrisitingarligar reglur

**§24.** Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent, leiða ta frítíðarundirvísing v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglunum í hesi lóg.

*2. petti.* Um so er, at ein kommuna hevur fleiri skúlaleiðarar, men ongan leiðandi skúlastjóra, so tilnevnir kommunan ein av skúlaleiðarunum ella ein serstakan skúlaleiðara at taka sær av tí í 1. petti nevnda verkevni. Landsskúlaráðið skal góðkenna hesa tilnevning.

*3. petti.* Eftir tilmæli frá tí í 1. petti nevnda leiðara kann eitt bý/bygdaráð, eftir at tað hevur fingið ummæli frá skúlanevndini, seta leiðaranum eitt ella fleiri hjálparfólk, sum undir eftirliti leiðarans tekur sær av teimum verkevnum, sum eru løgd á leiðaran eftir 1. petti.

*4. petti.* Landsskúlaráðið góðkennir nærri reglur fyri tí virksemi v.m., sum tað í 3. petti nevnda hjálparfólk kann útinna, og eftirlitinum við tí.

*5. petti.* Landsskúlaráðið ásetir setanarkorini og lønina hjá leiðarum, hjálparfólki og lærarum við frítíðarundirvísingina v.m.

**§25.** Bý/bygdaráðið og skúlanevndin hava skyldu at tryggja, at ásetingarnar í hesi lóg verða fylgdar.

*2. petti.* Tær skyldur, sum bý/bygdaráðið og skúlanevndin hava eftir hesi lóg, kunnu eftir góðkenning Landsskúlaráðsins heilt ella lutvíst latast einum felagsskúlastýri og viðkomandi felagsskúlanevnd ella øðrum kommunalum felagsskapi upp í hendi.

*3. petti.* Tær í 2. petti nevndu skyldur, ið eru latnar til ein annan stovn, kunnu við 1/2 árs frest verða fluttar aftur til kommununa til byrjan av einum skúlaári.

**§26.** Landsskúlafyrisitingin kann tryggja neyðuga samskipan millum frítíðarundirvísingina v.m. eftir hesi lóg í teimum einstøku kommununum og millum hesa undirvísing v.m. og undirvísingina í øðrum undirvísingarstovnum.

## 7. táttur. Aðrar ásetingar

**§27.** Landsskúlafyrisitingin kann veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti til frítíðarundirvísing v.m., allan ella lutvísan stuðul. Hon kann skipa fyri, at skeið verða hildin.

**§28.** Settur verður á stovn ein grunnur, sum kann veita studning og/ella lán til tess at fremja frítíðarundirvísing v.m. eftir hesi lóg.

*2. petti.* Landskassin veitir grunninum árliga eina peningaupphædd, ið svarar til 5% av øllum studningsheimilaðum útreiðslum til góðkenda frítíðarundirvísing v.m. eftir 2., 3. og 5. tátti í hesi lóg.

*3. petti.* Í grunnin koma somuleiðis rentur og avdráttir av teimum lánum, sum grunnurin hevur veitt, eins og tær serstøku árligu játtanirnar, ið ásettar eru á fíggjarlógini.


*4. petti.* Landsstýrið ásetir viðtøkurnar fyri grunnin.

## 8. táttur. Ásetanir um, nær lógin fær gildi v.m.

**§29.** Henda lóg fær gildi 1. august 1983.

*2. petti.* Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstudning til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935, fer samstundis úr gildi.

RED: 10 X



Nasjonalbibliote

**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12

